Løgtingstíðindi 1989 – Ískoyti

Avskrivaði orðaskifti. Bert lítil partur av orðaskiftinum hetta árið er avskrivaður.

4. fundur.

Týsdagur 19. september 1989.

Kl.10°°.

Á skránni:

Viðgerð av løgmansrøðuni 1989.

1. viðgerð av fíggjarløgtingslóg 1990.

Atkvøðugreiðsla í 5 fyrispurningum og framløga.

Formaðurin

Tingfundur er settur.
Skrivarin lesur gerðabókina frá seinasta fundi.

Skrivarin

Tað er 3. fundur, ár 1989, hósdagin 31. august kl. 17°° var tingfundur settur.

Allir tingmenn vóru á fundi, uttan Jógvan I. Olsen, allir landsstýrismenn uttan Jógvan I. Olsen vóru á fundi, løgmaður var á fundi, ríkisumboðsmaðurin var á fundi. Gerðabókin frá seinasta fundi var upplisin og góðkend.

Til viðgerar vóru innkomin skriv. Tað fyrsta er dagfest 31. august 1989 frá Olaf Olsen, ið biður um farloyvi meðan hann er landsstýrismaður og næsti maður á fólkaflokslistanum tekur sæti á tingi fyri hann. Formaðurin bað Hergeir Nielsen, John Petersen og Jógvan Á. Johannesen kanna hvør næstur var. Við 30 atkvøðum fyri og ongari ímóti, var samtykt, at Jógvan Á Lakjuni skuldi taka sæti á tingi fyri Olaf Olsen.

Formaðurin læs skriv frá M/s Akraleitið o.f. dagfest 15. august 1989 viðvíkjandi friðing av ávísum økjum kring Suðuroynna fyri ávísum skipum. Málið var beint í

fiskivinnunevndina.

Formaðurin læs eisini skriv dagfest 30. august frá 27 fak feløgum ið mótmæla inntøkulógina. Hetta mál var lagt fyri seg, og skal leggjast til málið um tað kemur fyri tingi.

Sum nr. 2 var framløga og Ivan Johannesen legði vegna landsstýrið fram mál nr. 10, uppskot til fíggjarløgtingslóg árið 1. januar til 31 desember 1990. Formaðurin boðaði frá fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen til løgmann og einum frá Jógvan við Keldu til Jógvan I. Olsen. Atkvøtt verður á næsta fundi um teir skulu svarast.

Uttan fyri dagsskránna bað formaðurin um, at vald verða 2 umboð til nevndina P/F Flogleiðir. Fyri samgonguna var vald Sigrun Joensen, Froðba og fyri andstøðuna var Leivur Johannesen Tórshavn valdur.

Formaðurin setti næsta fund at verða týsdagin 5. september 1989 kl. 14°° við hesi dagsskrá:

1. Ein viðgerð av løgmansrøðuna.

2. Ein viðgerð av tingmáli nr. 10 fíggjarløgtingslóg 1990.

Framløga.

Fundur lokin.

Síðan er hent tað, at hesin fundurin, sum nú er byrjaður, er tann sum skuldi verða 5. septemper sum hevur verið lýstur í útvarpinum.

Formaðurin

Eru tað viðmerkingar til ta lisnu gerðabókina? Tað er ikki, so er hon góðkend.

Tað er eitt skriv komið til løgtingið: Av tí, at undirritaði er valdur í landsstýrið, verður biðið um, at næsti maður á sambandslistanum fyri Eysturoynna tekur sæti á løgtingi í mín stað. Jógvar I. Olsen.

Vegna forfall verður biðið um farloyvi frá ting-

arbeiðnum í 7 dagar frá í dag at rokna, biðið verður um loyvi sum sambært grein 23, 4 stk. í tingskipanini uttan løn. Samstundis verður biðið um, at tann næstvaldi á lista Fólkafloksins í Vágum far sæti á tingi í farloyvstíðini. Sandvágur 19. september. Svend Aage Ellefsen.

Við hesum loyvi eg mær, at heita á løgtingi, um at loysa meg úr starvinum sum løgtingsmaður fyribils, til eg skriviliga boði tinginum frá, at eg aftur taki sæti á tingi. Samstundis verður biðið um, at næsti maður á lista tjóðveldisfloksins í Eysturoy tekur sæti á tingi fyri meg. Eg fari at biðja Hergeir Nielsen, Atli Dam og John Petersen um at kannað valbrøvini fyri hesar listar.

Eg skal boða frá einum fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen til Jóngerð Purkhús landsstýrismann og støða verður tikin á seinni fundi um hesin fyrispurningur skal svarast.

Síðan fær Jógvan I. Olsen landsstýrismaður, orðið fyri framløgu av tingmáli nr. 8, broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðum til útflutnings.

Jógvan I. Olsen (sb.)

Harra formaður.

Vegna landsstýrið skal eg leggja fram tingmál nr. 8, broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum
á føroyskum skipasmiðum til útflutnings.

Í viðmerkingunum verður sagt, at byrjað varð, at byggja stálskip í Føroyum 60'unum og um hetta sama mundi var innflutningsgjald lagt á allar vørur. Hetta gjald sum skipasmiðurnar eisini skuldi gjalda fingu tær afturgoldið við at skjalprógva útreiðslurnar í samband við nýbyggingar. Henda skipan helt fram í nøkur ár, men var so torfør at umsita bæði fyri umsitingina og skipasmiðurnar, at hon var broytt til, at skipasmiðurnar fingu útgoldið sama prosenttal sum innflutningsgjaldi varð roknað av metingarvirði skipsins tá ið tað var liðugt. Endurrindingin var eftir løgtingslóg nr. 24 fá

1. juni 1978 við seinni broytingum 16%. Við løgtingslóg nr. 102 frá 19. august 1988 var lógin aftur broytt til tað upprunaliga hvar av studningur fyri serliga innflutningsgjaldið var goldið eftir váttan frá gjaldstovuni. Uppskotið frá landsstýrinum er gjørt eftir áheitan frá skipasmiðuni. Skipasmiðurnar vísa á, at umsitingin av nýggju skipanini er ógvuliga torfør. Eftir broytingini fáa skipasmiðurnar upp til 15% endurgoldið í mun til 16% eftir lóg nr. 24 frá 1. juni 1978. Við loyvi frá formanninum skal eg lesa lógina upp. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðum til útflutnings.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 38, frá 20. mei 1988 um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðum til útflutning verða gjørdar hesar broytingar.
1. § 5. stk. 1 verður orðað soleiðis, til fulla ella partvísa endurrinding av serliga innflutningsgjaldinum av tilfari til bygging av deksfiskifari í Føroyum kann skipasmiðan fáa í studningi upp til 13% av virði skipsins eftir meting. § 6 stk. 2 verður strikað. § 2. henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd og er við hesum løgd fyri tingið at viðgera.

Formaðurin

Síðan fær Jógvan I. Olsen landsstýrismaður orðið fyri framløgu av tingmáli nr. 9, broyting í løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

Jógvan I. Olsen (sb.)

Harra formaður.

Vegna landsstýrið skal eg leggja hetta uppskotið fram, sum hongur saman við tí fyrra.
Í viðmerkingunum her verður sagt, at víst verður til viðmerkingar í løgtingsmálið nr. 8, 1989, broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðum til útflutnings. Við formansins loyvi, skal eg leggja hetta uppskotið fram. Uppskot til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum.
§ 1. Í løgtingslóg nr. 102, frá 19. august 1988, um endurnýgging av fiskiskipaflotanum verður gjørd henda broyting. Í § 5, stk. 1 verður orðaðsoleiðis. Til fulla ella partvísa endurrinding av serliga innflutningsgjaldinum av tilfari til bygging av deksfiskifari í Føroyum, kann skipasmiðan fáa í stuðningi upp til 13% av virði skipsins eftir meting.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Her við er hon framløgd til tingsins viðgerð.

Formaðurin

Síðan fær Signar Hansen landsstýrismaður orðið fyri framløgu av tingmálið nr. 4, broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar.

Signar Hansen (tf.)

Harra formaður.

Í seinastu landsstýrissamgongu var spurningurin um bygging av HF og studentaskúlanum í Eysturoynni viðgjørdur. Tá sitandi samgonga tók ta avgerð, at HF og studentaskúlin skuldi byggjast á Kambsdali um peningaligir og undirvísingarligir fyrimunir vóru fyri flyting. Kanningin sum gjørd varð vísti, at stórir fyrimunir vóru við skúlan um hann var sambygdur við handilsskúlan á Kambsdali og var tí uppskot lagt fyri tingið og mælti til, at fylgja kanningarúrslitið ið nevndin var komin til. Málið var tó ikki avgreitt í tinginum og fall sostatt burtur. Sitandi landsstýrissamgonga hevur tikið ta støðu, at HF og studentaskúlin í Eysturoynni skal sambyggjast við handilsskúlan á Kambsdali, tí hetta gerst munandi bíligari bæði við bygging og rakstri.

Teir viðmerkingar sum standa í hesum uppskotinum aftrat eru, í grundini teir somu sum stóðu í tí seinasta uppskotið sum var lagt fyri tingi, men uttan tað, at tað sum lagt er aftrat, at hetta landsstýrið hevur kannað

hetta málið gjøllari og er sannført um, at tað uppskotið sum var lagt upp fyrr og sum ikki var samtykt tað er tað rætta. Tí skal eg loyva mær at lesa bara broytingarnar til sjálva
málina. Har stendur í § 1. Í § 1 stk. 2 punkt 1 í løgtingslóg nr. 62, frá 9. juli 1988 um ávísar skúlar verður gjørd henda broyting. Gymnationala útbúgving á Kambsdali.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Við hesum er málið lagt fram.

Hergeir Nielsen (tf.)

Harra formaður.

Tað eru umsøknir um, at verða loystir úr tingstarvinum frá Signar Hansen, Jógvan I. Olsen og Svend Aage Ellefsen. Í Eysturoyar valdømi hjá Tjóðveldisflokkinum er tað soleiðis, at Signar Hansen hevur flestar atkvøður 421, og næstur honum er tað Petur Reinert við 382 atkvøðum og vit vilja mæla tinginum til, at atkvøða Petur Reinert inn á ting fyri Signar Hansen.

So er tað sambandslistin í Eysturoynni. Har er tað soleiðis, at Jógvan I. Olsen hevur 377 og Edmund Joensen 308 og triði maður á listanum er Jákup Lamhauge á Saltangará við 215 atkvøðum, og vit fara at mæla tinginum til, at atkvøða hann inn á ting. Síðan er tað atkvøðugreiðslan í Vágum hjá Fólkaflokkinum. Har er tað soleiðis, at Svend Aage Ellefsen hevur flestar atkvøður 199 næstur honum er tað Jørgen Niclasen úr Sørvági við 79 atkvøðum og vit vilja mæla tinginum til at atkvøða hann inn á ting.

Formaðurin

Vit skulu til at atkvøða um hesa tilráðing at Jørgen Niclasen og síðan Jákup Lamhauge og Petur Reinert kunnu taka sæti á tingið. Vit atkvøða, ger so væl. 27 atkvøður sostatt eru teir valdir inn á ting við

27 atkvøðum fyri. Síðan eru tað 5 fyrispurningar sum eru fráboðaðir og vit skulu til at atkvøða um hesir fyrispurningar skulu svarast. Tann fyrsti er 100-1 frá Maritu Petersen til Signar Hansen, hvar hon sigur, at í samband við, at landsstýrið hevur givið loyvi til, at senda handilslýsingar/ reklamu í Sjónvarp Føroya, verður landsstýrismaðurin í mentamálum spurdur, um landsstýrið hevur tryggja sær at handilslýsingar ið sendar verða ikki verður í stríð við endamálið fyri Sjónvarp Føroya sambært løgtingslóg nr. 77 frá 21. mei 1982, har tað í grein i 4. stk . stendur. Sjónvarp Føroya hevur til endamáls at hava objektivan saklígan og upplýsandi tíðindaflutnig og sendingar annars, ið varveita
og fjálga um føroyska mentan, átruna og siðlæru. Sum nr. 2 vil landsstýrismaðurin tryggja at slíkt virksemi í Sjónvarp Føroya í kann verða í stríð við nevndu lóg ikki verður sett í verk fyrr enn tingið hevur havt møguleika at viðgera málið.

Sum nr. 100-2 er tað fyrispurningur frá Jákup Lindenskov til løgmann, hvar spurt verður hvørja ætlanir hevur landsstýrið at seta í verk fyri at tryggja, at avgjaldshækkingarnar ikki kona at raka vanliga brúkaran harðari enn ætlað. Vegna tess, at vørurnar sum longu er prógvað dýrka nógv út yvir tað sum avgjøldini bera í sær. 2. Landsstýrið sigur seg ætla vinningsteðg um nakrar mánaðir. Hvussu ætlar landsstýrið at afturføra prisleguna til tað hon átti at verða um miðan juli tá avgjøldini vóru samtykt.
3. Samgongan fer at seta úr gildi dýrtíðarviðgerina av lønum og sum skilst helst eisini lønarsteðg. Ætlar samgongan at tryggja løntakaranum eina serliga dýrtíðarviðbót sum í minsta lagi veitir endurgjald fyri hesar órímiligu og óætlaðu prishækkingar áðrenn hesa avtøku av dýrtíðarskipanini.

Sum nr. 100-3 er tað ein fyrispurningur frá Jógvan við Keldu til Jógvan I. Olsen, har spurt verður, hvørjar eru orsøkirnar til, at avgerin soleiðis endurtikin at hesin stovnur ikki kann verða fluttur úr Havnini hagar tað eru betur havnaøki bæði inni á landi og tá tað snýr

seg um sjálva atløgusíðuna til ávikavist skrívstovu, goymslu og skip. Sum nr. 2. Hevur landsstýrið kannað fíggjarligar fyrimunar at leggja stovnin møguliga í Klaksvík sum talan hevur verið um heldur enn, at skotrast í ov trongum og ov dýrum øki.

Sum nr. 100-4 er tað ein fyrispurningur frá Henrik Old løgtingsmanni til Jógvan I. Olsen landsstýrismann, hvar spurt verður. Kann landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum tryggja, at tey skip úr Suðuroy sum í ár hava Íslandsloyvi fáa kvotur á hædd við onnur skip í landinum.

Tann 5. er fyrispurningur frá Niels Paula Danielsen til løgmann. Hvar tað verður spurt, nær verður suspensiónin og skúlastjórin í Vági settur aftur í starv sítt. Er tað ynski um, at tað skal atkvøðast hvør sær, ella kunnu vit taka teir saman. Fyrispurningur verður eftir áheitan frá Niels Paula Danielsen afturtikin. Er tað ynski um, at teir 4 sum eftir eru skulu atkvøðast hvør sær, ella kunnu vit verða felag um allar saman? Vit atkvøða, ger so væl. 27-0 atkvøðum.

Síðan fer fram viðgerð av løgmansrøðuni og 1. viðgerð av fíggjarløgtingslógini. Um eingin mótmælir, so ætla við at viðgera hesi málini undir einum. Fyrti røðari er Anfinn Kallsberg.

Anfinn Kallsberg (ff.)

Harra formaður.

Vit hava 2 stór mál til viðgerar í dag. Fyrr var tað soleiðis, at løgmansrøðan var tað eina stóra orðaskifti og fíggjarlógin var hitt stóra orðaskifti á tingið. Men av tí, at fíggjarárið er broytt so fellur viðgerin av hesum báðum málum nú saman.

Eg skal kanska ikki gera so nógv við sjálva løgmansrøðuna, kanska heldur leggja meg á nakrar generellar økonomiskar spurningar, men tó vil eg líka sum taka burtur úr innleiðingini í løgmansrøðuni og eg fari at biðja formannin um at sleppa at sitera tá ið tað er neyðugt.

Løgmansrøðan er í 21 punktum og hon viðvíkur stórt

sæð øllum málum í samfelagnum og tað sum serliga dentur er lagdur á í hesi løgmansrøðuni, tað er eisini tað sama, sum serligur dentur var lagdur á í samráðingunum upp til nýggja samgongu bæði í januar mánað og eisini í juni mánað, nevnliga tey búskaparligu tiltøkini sum neyðug eru at fremja. Teir innleiðandi kapitlarnir í løgmansrøðunin eru eisini um búskaparligu gongdina og so um nøkur búskapar og fíggjartøl. Eg fari at sitera nakað frá síðu 5, har víst verður á, at handilsjavnin fyri 1988 vísir eitt hall upp á 1, 2 mia.kr. tá skip eru íroknað og nærum 800 mió.kr. tá skip eru frátald. Í báðum førum er hetta met. Handilsjavnin fyri fyrra hálvár 1989 sýnir bert eitt lítið hall, men serliga innflutningstølini eru óviss. Helst fer handilsjavnahallið í 1989 at verða væl minni enn undanfarin ár, hetta kemur av 3. orsøkum, nevnliga at færri skip verða innflutt,

minni vanligur innflutningur og eitt sindur hægri útflutningsvirði. Gjaldsjavnahallið í 1989 verður helst eisini væl minnið enn undanfarin ár, men kortini verður eitt hall, tað vil siga, at samlaða uttanlandaskuldin økist, hóast við ikki so stórari ferð sum áður. Málið hjá landsstýrinum er, at minka um vøksturin í uttanlandsskuldini í 1989 og at fáa gjaldsjavnayvirskot í 1990 soleiðis, at sjálv skuldin minkar sjálvt um tað verður við smærri upphæddum at byrja við. Síðan verður nevnt um gjaldføri hjá landskassanum sum er versnað sera nógv seinasta ár og í løtini er sera tepurt. Nakrar av útreiðslum landskassans í 1989 verða hægri enn mett á fíggjarlógini serliga snýr tað seg um veðhaldsútleggini og tollinntøkurnar áðrenn hækkingarnar verða helst minnið enn mett, kanska einar 100 mió.kr. Saman um tikið er væntandi at roknskapurin hjá landskassanum fyri 1989 fer at vísa eitt hall upp á 200-250 mió.kr. Har umframt stavar gjaldføriskreppan at tað er ikki minsti partur frá gjaldførishallið í 1988 upp á 352 mió.kr. Hetta er sera døpur tala, síðan kemur landsstýrið inn á tey tiltøk sum skulu til fyri at broyta hesa gongdina. Vit hava nú fingið fíggjalógina á borðið fyri 1990 og í tí uppskotinum verður líka sum lagt út hvat í hesi búskapar-

ligu tiltøkini also hvønn veg ið tey bera. Tað er einki yvir at dylja, at tann vøkstur sum hevur verið í fíggjarlógunum undanfarin ár, hann má og skal steðgast. Landsstýrið ger her eina roynd at steðga tí og eg haldi sjálvur, at hetta er ein brúkilig byrjan, men spurningurin er bara um hetta er nokk fyri at venda gongdini. Um vit hyggja at tølunum fyri fíggjarlógini fyri 1990 so eru ikki tey stóru útsvingini í mun til í 1989, ikki um man tekur tað upp á gruppurnar sjálvar, men fara vit heilt aftur til 1988, so er rættiliga stórur munur á. Eg kundi hugsa mær at nevnt nøkur av hesum málsøkjunum sum hava verið fyri stórari skerjing. Ein av teimum stóru er, at á samferðsluøkinum á grein 13, sum minkar við 22,6%, tað er sjálvsagt, at hetta gevur líka sum eitt bakslag úti um landi, tí tað minkar um aktivitetin. Upp á sama máta so er samferðslan sum so, also strandfaraskipini og bygdleiðir rættiliga munandi skerdar við hesum uppkotinum. Men hyggja vit longur aftur, hyggja vit aftur til rokniskapsárið 1984/1985 og samanmeta tað við tølini fyri 1990, so má man konstatera, at tað eru rættiliga stórar økingar á øllum økjum uttan á strandfaraskipum, har er ein reel lækking upp á 21% í mun til 1984 tølini. Annars hava vit bygdleiðir sum veksur við 105%, løgtingið við 60%, landsfyrisitingin við 85%, heilsumálini við 61%, samferðslumálini við 25%, skúlamálini við 106%, mentamál við 125%, fiskivinnan við 17%, landbúnaður við 40%, handil við 31%, pensiónsgjøld við 113% o.s.fr. Men eg eri greiður yvir, at man kann ikki samanbera hesi tølini soleiðis, tí tað eru farnar fram nakrar ógvuliga stórar lógarbroytingar í hesum tíðarskeiði, tað skal man so taka hædd fyri. Eg veit, at almannamál sum er vaksið við 113%, har eru faktorar inni, bæði av broyttari lóggávu og eisini av umlegging av m.a. barnastyrkinum. Barnastyrkurin gongur inn nú í grein 19, fyrr gekk hann beinleiðis frá í skattinum, men alikavæl er tendensur til rættiliga stóran vøkstur yvirhøvur. Hyggja vit annars at tølunum, so vil eg siga, at landsstýrið hevur gjørt eitt megnar arbeiði, fyri at avmarka tann risavøkstur sum annars hevur verið og eg ivist í um tað ber til at skera meir av á hesi fíggjar-

lóg. Eg er heilt greiður yvir, at skulu vit halda fíggjarlógina fyri 1990 so er neyðugt við lógarbroytingum, tí tær lógir sum eru í gildi m.a. bæði á skúlaverkinum og á heilsuverkinum á almannaverkinum o.s.fr. tær hava krav um, at fáa meirjáttan, og vit kunnu bert hyggja eftir landsumsitingini sum í hesum tíðarskeiði er voksin við 85% og tað er ikki tí, at umsitingin sum so er blivin nógv meir ineffektiv, nei, tað er tí, vit hava álagt hesi somu umsiting fleiri og fleiri málsøkir og fleiri og fleiri mál at umsita. Spurningurin er tí ikki um her at standa og skerja í postun, tí eg veit, at tað verða ógvuliga nógvir tingmenn undir hesi viðgerini sum koma upp og siga, at tit hava sett ov lítið av peningi av. Spurningurin verður meira um at tillaga lóggávuna við rationaliseringum at gera tað einklari at fyrisita hetta samfelagið og harvið kanska gera tað minnið dýrt at umsita. Vit skulu sum politikara minnast til, at landi hvørja einastu ferð landi bjóðar eina service til borgararnar í hesum landið so er neyðugt hjá landskassanum at fara út og skaffa sær inntøkur, tí annars hongur roknstykkið ikki saman. Tað kann verða, at tey ógvuliga góðu fíggjarár sum vóru í 1986 og serliga 1987 við ógvuliga stórum yvirskotið á fíggjarlógini, í 1986 var tað 256 mió.kr. í 1987 321 mió.kr. tað hevur gjørt, at politikkarnir hava hildið seg havt ráð til at bjóða eina størri service. Men tað hevnir seg aftur í 1988, tá ið inntøkan er voksin, men útreiðslurnar eru voksnar so mikið meir, at tað neyvan er nakað avlop í 1988 og sum tað verður víst á í løgmansrøðuni 1989 gevur helst eitt hall. Eg tori at siga, at halda vit á í hesum sporinum í 1990, og ikki royna at gera nakrar skerjingar og broytingar so verður hallið í 1990 sjálvt við teimum hækkaðu inntøkulógunum sum eru gjørdar helst eitt tal upp á einar 400 mió.kr. Tað hevur so landsstýrið sett sær fyri og samgongan sett sær fyri, at tað skal ikki verða. Tí hevur tað verið neyðugt at framt niðurskurðir og at hetta kemur at pína tað er væl eingin ivi um, men tað er ein spurningur um vit politikarar ikki hava skyldu til at steðga á nú og fáa balanca í, tí tað er soleiðis, at tað skulu breiðar herðar til at bera góðar tíðir, og eg

haldi, at vit allir samlir og eg skal ikki geva skuldina til nakran, ti alt Føroya løgting hevur verið við til tað, vit hava verið í so stórtøknir og í dag mugu vit út at krevja tað inn sum skal fáa balanca í. Um vit hyggja at samfelagnum sum so, so er tað at landsbúskapurin hongur saman við hvat ið inntøkan til landið kann verða, treytað av hvat inntøku vit fáa kunnu vit so seta okkara útreiðslusíðu eftir. Har er tað soleiðis, at útflutningurin hjá okkum, tað er tað sum ber øllum, vit hava inntøku frá útflutninginum og man má siga, at hesin útflutningurin er ikki vaksin serliga nógv tey seinnu árini. Vit hava statsstuðulin frá Danmark hann gongur inn í roknskapin hjá okkum inn á inntøkusíðuna sum ein eyka inntøka hvar vit einki skulu yda av nøkrum slag, tað rennur bara frá Danmark og hertil og spurningur er um vit ikki áttu at fingið eitt sindur meir stýr á hesum peningi. Síðan er tað tað sum manglar í, tað fara vit út og lana úttan í frá. Hyggja vit at útviklingini í uttanlandsskuldini so er tað eyðsæð, at 1 mia.kr. um árið í uttanlandsskuld aftrat tað er alt alt ov nógv. Hetta samfelagi kann ikki tola, at vit hvørt ár fáa 1 mia.kr. sum manglar í á inntøkusíðuni í landshúsarhaldinum. Tá ið vit síðan hyggja at fíggjarlógini hjá landsstýrinum og fíggjarlógini tað er tað stýringsamboði sum landsstýrið og landshúsarhaldi hevur at stýra útviklinginum við, ja, so er tað soleiðis, at inntøkurnar har eru fyri tað mesta skattur og tollur og síðan hesin valsignaði statsstuðulin og eftir hesi inntøkusíðini skulu vit so tillaða eina útreiðslusíðu. Vit hava, um vit hyggja totalt eftir øllum útreiðslupostunum frá 1984 fram til 1990 so hava vit ein vøkstur í teimum almennu útreiðslunum also eg hugsi bara í rakstrarútreiðslunum upp á 65%, innflatiónin í sama tíðarskeiði hevur kanska verið eini 10-12% so má man nokk siga, at man hevur frá almennari politiskar síðu, verið framman fyri tað sum hetta samfelagið annars kann kasta av sær til okkum at ráða yvir. Í sama tíðarskeiði er útflutningurin kanska vaksin við eini 20%, so krøvini frá landsstýrinum og frá landshúsarhaldinum til tað berandi nevnliga tað vinnu sum skal skapa útflutningsvirði hevur verið ov stór. So er

spurningurin, hvat kann gerast, jú, sjálvandi eiga vit at spara sum mest, men eg trúgvi ikki, at vit loysa kreppuna bert við at spara. Vit eiga í øllum førum, at stuðla teimum tiltøkum sum skulu økja okkara útflutning og spurningurin er so aftur, okkara kostnaðarstøðið í Føroyum er tað ov høgt? Eg hugsi, at vit allir verða samdir um, at okkara konkurrance evnir mótvegis øðrum londum er rættiliga vánaligt. Hvussu hetta kann gerast, tað kunnu vit kjakast um, men eg haldi sjálvur at vit áttu at umhugsa, at lækka okkara kostnaðarstøðið og tað kann gerast við, at vit bæði lækka lønarlag og kostnaðarstøðið í Føroyum harundir bæði skatt og toll, soleiðis at keypiorkan verður tað sama. Eg veit, at hetta er ógvuliga ringt at gera, men eg trúgvi, at hetta er tvingandi neyðugt at gera um vit skulu varveita Føroyar sum eitt vælferðarsamfelag. Eg havi valt í hesum umfari, ikki at koma inn á nakrar ávísar postar á fíggjalógini, tað verður høvi til tess fleiri ferðir frameftir, men eg havi hug, at nerta nakað við fiskivinnuna. Fiskivinnan er jú okkara høvuðsvinna og í hesum yvirlitið sum eg havi gjørt yvir postarnar so sæst, at hon er ikki tann sum hevur fingið ta stóru økingina í tilskotinum frá landskassanum. Frá 1984-1990 bert 17,8%. Tað eru ætlanir um, at fremja tiltøk sum upp á longri sikt skuldi gjørt, at hesin stuðulstørvurin minkaði og okkurt av uppskotunum kemur væl á tingborð nú fyrsta dagin, men eg rokni, við, at fyri at kunna náða hetta mál, so verður neyðugt í fyrstu atløgu at játta meir pening til fiskivinnuna. Vit hoyrdu í útvarpinum um kondemnering, her var ein kondemnering farin fram av 18 fiskiskipum hetta eru fiskiskip sum fingu játtað kondemnering í 1988 og peningur er tøkur til hesa kondemnering í grunninum. Tað hava verið ætlanir frammi í samgonguni um at broyta hesa skiparina so hon gerst meir einføld, kemur skjótari at virka og fær eina størri veiðuorku út úr flotanum, tað kann verða, at Jógvan I. Olsen kemur at greiða okkum nærri frá øllum hesum og hvussu langt ið tað arbeiði er komi. Tað hava eisini verið tankar frammi um eina uppboðsskipan sum skuldi gjørt, at ið hvussu so er meir fekst burtur úr ávísum fiskasløgum og tað er í øllum

førum eitt arbeiði farið fram har, men hvussu langt ið tað er komið tað fáa vit kanska eitt sindur meir at vita um. Tað hevur verið ført fram, síðan fíggjarlógin var framløgd, at nú verður skorið so nógv, at samfelagið kemur at liggja lamið, vit hava hoyrt stovnsleiðara sagt, at um tit skera so nógv niður á okkara stovni so fer hetta og hatta at liggja á láni so fer harda funktiónin ikki at virka, men eg trúgvi ikki upp á hetta, tí eg trúgvi virkiliga ikki upp á, at tað ikki kann sparast nógv av peningin innan fyri tað almenna. Vit hava eisini eina lóggávu í gildi í Føroyum sum er samtykt er sett í verk og tað eru ávísar langsiktaðar samfelagsíløgur sum gerast skulu, m.a. við skúlum, við skipum, við havnum og við samferðsluútbygging og tað er klárt, at hetta kemur at taka ein hóp av peningi úr landkassanum í árunum sum koma. Sitandi samgonga hevur skorið hetta niður rættiliga nógv, men skulu hesar lógir fremjast, og skulu tær fremjast í tí tíðarætlanini sum upprunaliga var ætla so trúgvi eg, at fíggjarlógin frammeftir kemur at bølna upp aftur meir. Vit skulu minnast til, at hesar íløgurnar koma í nógvum førum eisini at krevja ein øktan rakstur.

Í hesum fyriliggjandi uppskotinum verður sagt í framløguritinum hjá landsstýrinum verður sagt, at hetta uppskotið javnvigar við 3.111.000.000 kr. og til samanbering verður víst á, at fíggjarlógin fyri 1989 javnvigar við 3.198.000.000 kr. haraftrat eru inntøku og útreiðslulógir settar í gildi í 1989 sum veita landskassanum eina meirinntøku uppá umleið 195 mió.kr. So í veruleikanum javnvigar fíggarlógin fyri 1989 við 3.393.000.000 kr. sum er ein lækking upp á 8,3%. Eg haldi, at hetta er eitt brúkiligt útgangspunkt. Eg haldi, at um vit klára, at fáa hesa lógina at halda, eg trúgvi, at kampurin verður, at fáa 1990 fíggjarlógina at halda í veruleikanum. Fáa vit hana at halda, so haldi eg, at hetta er ein góð byrjan. Eg veit, at tað verður ringt, eg veit, at tað kemur at standa á hvørjum einasta samgongumanni í hesi samgongu fyri at fáa hesa fíggjarlógina at halda, men tað er mín vón, at vit hava rygg til at bera hetta. Vit fáa nógvan kritik, vit koma at verða undir einum øðiligum ágangi, serliga frá andstøð-

uni, men alternativi er, ruðuleiki á økonomiska marknaðinum og vit koma upp á longri sikt, at verða settir undir administratión tað er nakað sum eg ikki ivist i, tí haldi eg, at vit skulu binda um heilan fingur, vit skulu hava ein vaknan politiki vit skulu fylgja væl við hvat nú hendir í samfelagnum, tí vandi er á ferð eisini her. Vit mugu ikki enda úti í einum stórum arbeiðsloysi, men eg havi tað álit á sitandi landsstýrið, at so hvørt sum teir trupulleikarnir, teir stóru trupulleikarnir koma fram, so mugu vit verða skjótir á sjóvarfallinum og royna at bøta um skaðan so skjótt sum gjørligt. Tíðin hjá mær er longu farin. Eg skal í øllum førum í fíggjarnevndini gera mitt til, at nenda fíggjarlógin verður borðin so væl í gjøgnum har sum gjørligt. Vit eru sjálvandi opnir fyri øllum góðum, fornuftigum argumentum, men eg tori at lova, at tendensurin sum her er langdur hann verður ið hvussu so er tann sum verður førdur víðari. Takk fyri harra formaður.

Atli Dam (jv.)

Harra formaður.

Føroyar hava verið uttan veriliga stýring nú í meir enn 10 mánaðir, tað hava sitið 3 sokallað forrætningslandsstýrið, tó, at 2 tey seinastu eru vald av løgtinginum sambært parlamentarisku skipanini. Hitt fyrra kom sum kunnugt ongantíð í gongd vegna klandur, serliga millum Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin og hetta seinasta tykist ikki at hava funni stevið enn, men tað kemur kanska. Í hvussu so er, er tað torført at síggja, hvør myndar samgonguna og torført at hóma hvør stendur aftanfyri politikkin. Um tú ikki telist millum teirra sum hava evnini at síggja aftur um tjaldið, tí spyrja fólk um tað er Heini O. Heinesen ella Óli Breckmann sum mynda stýrið, tó at vit sum kenna leikin aftan tjald vita, at hesin sjónleikur millum Heina O. Heinesen og Óla Breckmann, hann helst verður leiktur fyri at dylja, at tað er ein maður, kanska ikki ein gang ein heilur flokkur sum hevur gjørt av, hvørji tiltøk skulu fremjast av hesi samgongu. Hesin er formaður Sambands-

floksins og tí sleppur hann ið skuldi verið leiðari samgongunar nevnliga Jógvan Sundstein ikki so ofta á pall, kanska helst bara tá Pauli Ellefsen heldur tørv verða á, at løgmaður skal avdúka eitt tørvandi handlag at savna eina samgongu sum kann mynda ein samlaðan politik sum er samansjóðaður av sjónarmiðum alra teirra tríggja flokka og ikki eru tiksar idéir hjá formanni sambandsfloksins Paula Ellefen ella harraboð frá Schlüter, sum nú eina tíð er farin at draga inn aftur av tí sjálvstýrið og tí sjálvsavgerarrætti sum vit við tógvi stríð hava vunnu okkum seinastu 61 árini, nevnliga síðan Javnaðarflokkurin fekk umboðan á tingi. Tað er m.a. løgmansrøðan sum er til umrøðu her, og eg skal royna at viðgera tann generella politikkin sum hon gjarna skuldi umrøtt og sett út í kortí. Fíggjarnevndarlimar okkara Jørgen Thomsen og aðrir koma so meir nágreiniliga, at viðgera fíggjarlógaruppskotið sum ítøkiliga er meir týdningarmikið enn tann leysara orðingin í løgmansrøðuni. Eg haldi annars, og tað haldi eg Anfinn Kallsberg var inni á tí sama, at tað er eitt sindur óheppi, at løgtingi er komi inn upp á, at viðgera hesi bæði mál undir einum. Tey hava hvørt sær uppiborið eina serstaka viðgerð sum væl kundi við einum millumbili upp á 192 víkur. Eg haldi ikki, at tingmenn eru so nógv til fundar í løgtinginum, at teir blivu ovbyrjaðir av tveimum slíkum viðgerum. Eg haldi, at veljarin, skattaborgarin hevði krav upp á, at vit góðu honum møguleika fyri, meir nágreiniliga met um hesi mál, serliga nú vit sigla so kolveltandi samfelagsbroytingar sum standast av, at samgongan ikki dugdi, at avvega virksemi soleiðis, at tað hóskar til okkara tørv og orku.

Løgmannsins frágreiðing er annars ikki sinnisrørandi, tó at hon tíðuliga sigur frá, at tað er sami høgrapolitikkur, sum er miseydnaður í fleiri av okkara grannalondum, sum nú skal roynast í Føroyum. Løgið, kannst tú siga, tá ið teir áttu at vita, at úrsliti av hesum politikki, tað hevur roynst nær um størsta arbeiðsloysi sum søgan veit um, uttan at búskapurin er bøttur eitt vet. Uttan at skattatrýstið er lækkað. Uttan at heimshandilin er vorðin frælsari. Uttan at tilfeingis

nýtslan er minkað og uttan at tað umhvørvið, sum allir okkara solidaritetur átti at bygt á, hevur fingið tað betri. Tí rapað tey ultrakonservativi stýrini eystanfyri fjarntjaldið og tey ultrakonservativi stýrini vestanfyri fjarntjaldið nú frá hond og javnaðarhugsjónirnar fáa betri gróðrarlíkindi. Tí er tað so bagvent, at vit Føroyingar nú fleiri sjóarføll seinni fara at apa okkum eftir hesum miscydnaða politikki. Hetta letur seg bara gera, tí at ein av teimum stóru flokkunum í fjørð, snarað̈i 180 stig, og gjørdist borgarligur burturav ella lat í hvussu er nakrar borgraligar politikkarar sum taka leiðsluna aftaná teir gomlu, sum kortini royndi at verja nøkur vunnin mál hjá arbeiðandi stættini, tó at hini tjóðskaparligu rakstrarrópini eisini róku ein hóp av konservativum í somu rætt.

Løgmaður roynir sum undanfarnu løgmenn í røðu síni at nerta við nærum øll samfelagsøkið og í disponeringini av talunni er hann rættuliga bundin av raðfylgjuni, sum málsøkini vanliga blivu umrødd, men hann roynir at gera tað styttri og tað skal hann hava rós fyri, serliga í teimum ítøkuligu tilætlaðu lóggávunum og loysnunum á teimum einstaku økjunum, nøkrum fáum økjum, ger hann hetta nokkso óinnballað, og avdúkar tað høgrasnaring sum okkara samfelag verður fyri og tí eisini avdúkar hvat ið endamál fólkaflokksins við at royna at sleppa í landsins leiðslu var, nevniliga at fremja eina enn større umfordeiling frá skattaborgaranum til tann partin av okkara vinnulívsleiðslu, sum ikki hevur megnað at viki okkara vinnulív lønandi.

Røðan hjá løgmanni verður tí rættiliga refererandi, tí hon er so stuttorðað, og postulerandi, tað vil siga, at ein pástandur verður tikin sum veruleiki, uttan roynd at prógvføra. Hetta gevur í mongum førum nærmast ein telegramstil, heldur enn røðubrot, men hetta skal eg í hvussu er ikki lasta løgmann fyri, tí tá fáa vit í færri orðum lýsing av hvussu verunleikin sær út í eygum samgongunnar og hvørjar loysnir, samgongan ætlar. Er røðan ikki vánalig í sniði og orðavali og formi, so má ein um tann politikk, sum hon roynir at

lýsa og nýta gomlu vendingina um, at tað, sum er illa yrkt, verður vánaliga kvøðið, og er tað ikki løgið, tá ein hugsar um ta longu tíð 10 mánaðir, sum gingu áðrenn, samgongan í tí líki, sum hon nú hevur fingið, varð fullgingin.

Ja, ein kann siga, at samgongan er eitt sera vánaligt lív, tí hon er úrslit av so mongum loyndum og skipað út frá so nógvum persónligum serynskjum heldur enn evnum og vilja til at skapa ein samskipaðan umhugsaðan og undirbygdan politikk. Tað, at menn so bragdliga og av eiti, skipaðu eitt sokallað sjálvstýrislandsstýri, sum serliga tjóðveldismenn buldraðu sundur í spønir og síðan av óttu fyri einum møguligum veljaradómi móttu geva seg heilt og fult undir tær eyðmýkjandi treytir, sum Sambandsflokkurin setti Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum, tað gav hesum landsstýri eina serliga grund at standa á. So hóast løgmansfrágreiðingin skuldi lýst tað, ið farið er av hesum valskeiði, so eiga teir fýra mánaðirnir, sum sjálvsstýrissamgongan sat, lítlan part í henni, men er hon tann samfelagsmynd, ið Sambandsflokkurin hevur sett sær fyri sær samstundis, sum Sambandsflokkurin letur fólkafloksmannin Jógvan Sundstein greiða frá, hvønn sambandspolitikk, allir hesir 21 samgongumenn skulu reka og samstundis sum hon rættiliga sníldisliga avdúkar við fólkafloksorðum ein part av tí taktiska spæli, sum Sambandsflokkurin rekur við sínum partnarum soleiðis, at teir júst eru har, sum teir skulu verða, tá ið veljarin einaferð aftur sleppur at tala.

Eg nevndi serynski og seráhugamál, men eisini hesi eru broytt frá tí, tær fyrru samgongusamráðingarnar byrjaðu til tær nú vórðu uppafturtiknar í juni í ár. Fyri Tjóðveldisflokkin má hetta tykjast eitt veruligt antiklimaks, sum tey kalla, ella sum eitt fall frá einum hugmóðstindi og niður í eina myrka gjógv, frá einum fulltónandi kravi til Javnaðarflokkin um saman við teimum at taka loysing til fullkomna kapitulatión og yvirgeving til sambandið í juni, tí ein hevði telvað sær alt av hondum eftir 4 mánaðum. So serynskið í dag er skorið niður til tað bara at sleppa at verða við.

Løgið nokk so eru ynski Fólkafloksins júst tey

somu eftir hondini at varðveita løgmanssessin og harvið eina leiðslu, sum ongantíð gjørdist leiðsla í hinari samgonguni, og sum nú vegna eina nýggja § 13 ikki kann gerast ein leiðsla, tí hesa hevur Sambandsflokkurin tryggjað sær í og við, at hann aftur fekk § 13 inn í.

Skal man so taka eitt serynski hjá Sambandsflokkinum burtursæð frá tí, at teir vilja reka henda sama gamla sambandspolitikkin, so er tað kanska pinkulítið ynski, og tað er at slepppa frá at fylgja við tíðini og fremja tær broytingar, sum øll vita eru neyðugar í samskiftinum millum Danmark og Føroyar, og sum heimastýrisflokkarnir náttúrliga saman við øðrum flokkum áttu at ført út í lívið, men tað vil Sambandsflokkurin ikki, tað hevur hann ikki viljað, hóast eg havi tosað fyri hesum síðani 1974, og tí ráddi um at halda Javnaðarflokkin uttan fyri hesa samgonguna og tað varð so góðtikið av øðrum flokki.

Løgmaður ger sum vera mann nógv burtur úr búskaparstøðuni, búskapargongdini og ætlaðum búskapartiltøkum. Eg skal eins lítið og løgmaður fara inn í serliga prógfrøðslu á hesum øki beint nú, tað fái eg høvi til seinni, og tí skal eg bara siga, at eg kann samtykkja í flestu av teimum hagfrøðisligu upplýsingunum, sum eru í røðuni, men eg kann als ikki verða samdur við løgmanni í metingum hansara av støðuni, og er eri heilt ósamdur um tey tiltøk, sum hann sigur fara at venda gongdini rætta vegin.

Vit hava víst á og tað stendur nú fleiri og fleiri av borgarunum greitt, at tiltøkini virka øvugt, tey virka nettup í móti ætlanini, og tey koma at gera tað, at hetta samfelagið kollsiglir og vit fáa tað, sum vít ikki hava kent í 30 ár, nevniliga eitt hóparbeiðsloysi. Fylgjurnar av hesum kenna vit øll, nøkur, kanska ikki so nógv sum í fimtiárunum, fara, ríma, flyta, vít fáa minni inntøkur í landskassan, vit fáa eina minkandi orku til at útbyggja hetta samfelagið og fremja nýíløgur serliga í vinnulívið, sum skal verða tað, sum arbeiðir okkum burtur úr trupulleikum. Hjólini fara at mala spakuligari og spakuligari og tann høvjðsvinna, sum teir siga, at tað er so neyðugt at økja afturberingina til, hon fær

bara øktar trupulleíkar.

Nú hevur verið so nógv frammi um at geva hvørjum øðrum skuldina fyri búskaparstøðuna, sum er í dag. Tað er undanfarna samgonga, sum hevur stýrt soleiðis, at alt stóð at rapa, tá ið hon legði frá sær, siga summir og partar av teirri samgonguni siga, at tað var eitt væl konsoliderað búgv, sum vit lótu eftir okkum, tað var yvirskot hvørt ár og tað var konsoliderað nógv til grunnar at standa í móti tapum við serliga o.s.fr.

Fíggjarmálaráðharrin Ivan Johannesen hevur skrivað, at nú er tað rokningin fyri marglæti javnaðarmanna, sum skal rindast, tað sama tykist Heini O. Heinesen at taka undir við, og tað er enn tá ikki neyðugt at argumentera fyri hesum her, at prógva hetta her. Ivan Johannesen, sum annars skuldi kunna, í tí starvi, hann nú situr í í hvussu so er, prógvført og argumentera, hann sigur bara, tað er bara so, argumentið er bara so, tað er einki argument, men o.k., tað er bara so, og at tað er tað almenna forbrúkið o.s.fr. o.s.fr.

Man kundi sjálvsagt fari og tjakast víðari um hetta her, men tað er ikki serliga gevandi og tað loysir so ið hvussu so er ikki teir trupulleikar, sum eru nú í dag, her og nú. Tí verður tað sjálvsagt neyðugt at líta fram eftir heldur, men fyri at kunna líta fram eftir og gera nakað positivt og munagott, so er tað eisini fyri neyðini at kenna teir skeivleikar í skipanini, sum vóru og sum framvegis eru. Eg havi einki í móti at taka í egnan barm og vísa á ein hóp av skeivleikum, sum undanfarna samgonga og fleiri av teimum samgongum, sum Javnaðarflokkurin hevur verið partur í, ikki megnaði at loysa, tí hesir her skeivleikarnir eru so álvarsamir, at verða teir ikki loystir, so kunnu vit nærum spara okkum ómakin.

Eg havi sagt frá í løgmansrøðu aftán á løgmansrøðu og nýggjáarsrøðu aftan á nýggjársrøðu og annars í skrift og talu um tey tiltøk, sum vit ikki megnaðu at fremja. Í summum førum orsakað av tørvandi møguleikum fyri at skapa politiska semju, tí at samgongur hava verið samansettar av høgraflokkum og meira vinstrahallum flokkum og í øðrum førum av tørvandi

dugnaligheit hjá okkum sjálvum og í uppaftur øðrum førum, tí at vit ikki høvdu ta neyðugu vitanina um tey veruligu viðurskiftini. Eg havi ferð eftir ferð víst á, hvørji stýrisamboð tað er neyðugt at fáa tí almenna í hendi, og hvat tað er vit skulu hava undir stýring eitt nú bankar, eitt nú sølupolitikkurin, eitt nú kapitalstýringin o.s.fr.

Helst var Javnaðarflokkurin ov illa mannaður seinast í tali, ikki í dygd hjá teimum einstøku tingmonnunum sjálvsagt, men í tali til at skipa eina samgongu, sum varð nóg sterk til at gjøgnumføra nøkur fleiri tiltøk, sum høvdu hjálpt í dag soleiðis, at tað varð neyðugt at havt eina fýraflokkasamgongu, og tær royndir við fýraflokkasamgongum hóast tann eina, sum var frammanundan, har var tann eini flokkurin ikki í landsstýrinum, men bara stuðulsflokkur, sjálvsstýrislandsstýrið á sinni, at tær sýna, at tað er ómetaliga torført at samskipa sjónarmiðini hjá 4 flokkum í mun til hjá 3 flokkum. Eg havi heldur einki í móti at viðurkenna, at í ávísum førum tóku vit helst ov rívan til og kanska á økjum, sum standa Javnaðarflokkinum serliga nær almannaøkinum, har vórðu helst nakrar lóggávur framdar, sum áttu at verið kanska eitt lítið sindur minni, og eg kann viðurkenna, at har góvu vit eftir fyri einum ávísum trýsti. Hesar lóggávurnar hvør sær eru sera góðar og sera neyðugar, og tað vóru ábøtur tiltrongdar á øllum teimum økjunum, men vit skuldu kanska havt tikið tað eitt lítið sindur meira "easy", sum teir siga, so at her er eitt øki, sum eg vil viðurkenna, at henda samgonga hevur arvað nakrar trupulleikar av, tí fíggingin av teimum lóggávum, sum vórðu gjøgnumførdar, hon krevur sítt, tað eru nakrar 10-tals mió., sum almannaøkið verður økt við orsakað av hesum her lógarbroytingunum. So skal leggjast afturat, at summar av teimum vóru ikki ætlaðar soleiðis, sum tær endaðu, eitt nú lógin um barnastudning, tað var ikki ætlanin, hon skuldi kosta so nógv, sum hon kom at kosta
aftaná, at løgtingið broytti uppskotið hjá landsstýrinum.

Tað, sum stendur eftir, er, at nógvir av hesum her

skeivleikunum eru ítøkiligir í okkara samfelag enn.

Løgmaður sigur í síni talu, at tað var skelkandi at fáa kunnleika til, at hagtølini vórðu brøytt og sýndu eina uttanlandsskuld, sum var 2 mia. størri.

Eg havi ferð eftir ferð sagt, at eg ivaðist eitt lítið sindur í hesum tølunum, men eg mátti góðtaka tey, tí tey vóru útgivin av Hagdeildini, sum eg havi stórt álit á. Men framman undan vóru tølini jú eisini gjørd upp eftir teimum metingum, sum man altíð hevur brúkt, so okkurt mátti verða hent í hesi tíðini, sum ikki hevur verið fyrr. Eg haldi meg hava fingið í tí tilfari, sum nú var útbýtt á ólavsøku, ein part av frágreiðingini.

Tað hevur verið tosað so sera nógv um realkreditlánini, hvussu skaðilig tey vóru. Tey vóru als ikki skaðilig tvørtur ímóti. Tað skaðiliga var tað, at bankarnir, teir privatu bankarnir, sum allir hava havt slíkt álit á, og sum teir borgarligu flokkarnir hava mælt til skulu stýra hesum samfelagnum, at teir í staðin fyri at binda tann yvirskotslikviditet, teir fingu av hesum her realkreditlánunum, heldur lántu tey út til eitt rentustøði upp á 11-12%, tó at realkreditlánini vóru niðan fyri 9% ein yvirgang. Hví gjørdu teir hetta her? Tað var tí teir gjørdu tað í einari kapping sína millum í staðin fyri at konsolidera og ansa eftir likviditetinum, so kappaðust teir um markanðin hjá innskjótarunum og tí gekk tað galið.

Nú upplýsir líkningarráðið, at tapið hjá landskassanum av rentu, sum verður mótroknað innistandandi rentu hjá privatum innskjótarum og lánarum, er 32 mió.kr. Hetta svarar til 42%, also svarar rentan til millum 80 og 90 mió.kr. og lánið til 800 til 1.000 mió.kr. Hjá partafeløgum er hetta sama talið um 90 mió.kr., so vítt eg minnist, og tað er jú 50%, so tað svarar til eina rentuútreiðslu upp á millum 180 og 200 mió. ella eina lántøku upp á 2 mia. Hetta er alt sovorðið, sum verður mótroknað tilskrivaðari rentu og goldnari rentu, og so manglar líkningarráðið at gera eina kanning viðv. privatum, sum ikki eru partafeløg, og eg ivist ikki í, at har kanska liggja einar 2 mia. Tað skal verða ómetaliga løgið, um ikki ein veruliga stórur

partur av hesum nógvu milliardum ikki eru settar inn fyri at fremja eina rentuspekulatión, hon er löglig, og tað er einki at siga til kanska, at menn gera tað, tí tað er lógligt. Eg haldi, tað er nakað at siga til, at bankarnir so glaðbeintir hava medvirkað til tað hesi árini, og hatta verður avgjørt neyðugt at broyta. Eg eri steinsikkur upp á, at verður hatta broytt, so hvørva hasar 2 mia. "som dug for solen" beinanvegin.

Nú sigur formaðurin, at tíðin er farin. Eg fái orðið aftur og skal koma inn upp á hesi viðurskiftini, eitt lítið sindur viðv. fíggjarlógini, eitt lítið sindur viðv. tí, sum verður neyðugt at gera viðv. fiskivinnuni, og so skal eg taka eitt lítið sindur sepcielt, nei, tað má eg gera seinni um hatta seinasta, sum Anfinn Kallsberg segði um vandan fyri, at vit koma undir administratión. Spurningurin er, um herda samgongan, hetta landsstýrið ikki longu er sett undir administratión av Poul Schlüter.

Jógvan Durhuus, (tf.)

Harra formaður.

Til viðgerðar er løgmansrøðan 1989 og 1. viðgerð av løgtingsfiggjarlógini fyri 1990.

Sum øllum kunnugt, so gekk ógvuliga striltið at fáa eina samgongu skipaða eftir valið tann 8. november í fjør, men tann 18. januar í ár komu Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Kristiligi fólkaflokkurin ásamt um at fara í samgongu, sum longu tann 29. mai varð uppsøgd av Sjálvstýrisflokkinum.

Nýggjar samráðingar førdu til samgongu millum Tjóðveldisflokkin, Fólkaflokkin og Sambandsflokkin tann 22. juni. Tá hetta er fyrsta stóra altmenna orðaskiftið aftan á valið í fjør og síðani samgongan varð skipað, so verður orðaskiftið merkt av tí politiska ótryggleika, sum verið hevur meginpartin av hesum árinum.

Teir flokkar, sum nú sita í andstøðu, hava í fjølmiðlunum gjørt vart við sína ónøgd m.a. viðv. ætlaðu tiltøkum landsstýrisins, somuleiðis hava fakfeløg gjørt vart við seg.

Vit í Tjóðveldisflokkinum hava fingið nógvar ábreiðslur fyri okkara luttøku í hesi samgongu, og er tað ikki so løgið, tá ið vit vita, hvat hesir okkara samgonguflokkar standa fyri politiskt. Tá floksleiðsla Javnaðarfloksins í forhond hevði samtykt ikki at fara í samgongu við ávísar flokkar, so vóru samgongumøguleikar teirra ógvuliga avmarkaðir, og mundi hetta vera ætlað spæl fyri at sleppa í andstøðu og styrkja seg, og so kundu aðrir taka við ábyrgdini. Tað vóru tó einstakir av tinglimum Javnaðarfloksins, sum høvdu aðra hugsan, men hesir munnu ikki hava havt so stóra ávirkan.

Tjóðveldisflokkurin var við í samgonguni frá 1985-88 og taka vit okkara ábyrgd av okkara luttøku í hesum samgonguskeiði, men tann arvurin vit fingu frá samgonguni 1980-84 við einum farmaskipaflota, sum ongan møguleika hevði at bera seg við landskassaveðhaldum, sum øll gjørdust effektiv, og sum vit noyddust at rinda og megðaðu at rinda fleiri 100 mió.kr., fyri hevði sína stóru ávirkan á fíggjarligu støðuna, sum var kaotisk framman undan, tá vit arvaðu ein tómar landskassa, topp á tjóðbankan, trekk á tjóðbankan, stór trekk á peninga-stovnarnar og stóra skuld til Lønjavningargrunnin. Kort-ini megnaði fyrra samgongan at rinda hvørjum sitt og fáa slætt borð, ja, eisini at seta nakað væl á bók og í oljugrunn, hetta m.a., tí vit sóu tað neyðuga í inntøku-lógum og oljugjaldi, men søgan hevur enn eina ferð endurtikið seg, og tá hetta landsstýrið enn eina ferð legði nýggjar inntøkulógir fyri løgtingið, so er tað ikki minst fyri at rinda restskuldina frá 80-84-lands-stýrinum.

Royndir vóru gjørdar í kanska ov stóran mun av fyrra landsstýrinum at útbyggja ein svartkjaftaflota, sum av marknaðarviðurskiftum og sølutrupulleikum fyri stóran part fór undir hamaran. Við vánaligum útflutn-ingsprísum, serliga seinnu helvt av landsstýrisskeiðnum, er okkara veiðifloti komin ógvuliga illa fyri, og kennir Tjóðveldisflokkurin sína ábyrgd og loypir ikki frá. Vit sóu tað sum neyðugt um enn við ringum tannabiti at fara upp í hesa samgongu ikki minst fyri at verja vunnin stórmál, sum vit framdu í undan-

tarnu samgongu. Um Tjóðveldisflokkurin ikki var við í hesi samgongu, so var lógin um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn avtikin, men nú er so ætlanin, at grunnurin fer undir virksemi sítt tann 1. januar 1991 í staðin fyri 1. januar 1990. Seinkanin stendst av tekniskum orsøkum, sum Líkningarráðið hevur víst á. Barnastyrkurin verður ikki avtikin, sum andstøðubløðini hava sagt frá, men tá játtanin er nakað skerd, so verður hesin styrkur broyttur og møguliga verður lagt aftur til frádrátt í skatti.

Nýggj uppgerð yvir føroyska ogn og skuld uttanlands vísir, at uttanlandaskuldin við árslok 1987 var 5.792.000.000 kr. móti áður uppgjørd 3.875.000.000 kr. Sambært tilfari frá Hagdeildini, so týðir alt upp á, at vøksturin í nettoskuldini frá 85 til 87 í høvuðsheitum ella í mesta lagi stavar frá privatari skuld. Hóast undanfarna landsstýrið royndi at avmarka uttanlanda lántøku, so má viðgangast, at hetta eydnaðist ikki í nóg stóran mun, og tað bendir eisini okkara skuld uttanlanda á. Nógv er keypt og bygt, handilsbygningar o.a. fíggjað við lánum frá seljara ella við valutalánum við peningastovnaveðhaldum, sum nærum tvífaldaðust frá 1985 til 1987. Teir størru bankarnir hava í seinastu ársfrágreiðingum sínum havt peikifingurin á lofti og kanska tað av røttum viðhvørt, men teirra lutur liggur ikki eftir, tá tað hevur snúð seg um at hækka kostnaðarstøðið, somuleiðis kann vísast á teirra ótálmaðu um- og útbyggingar, so vit skjótt hava bankadeild á hvørjum tanga, hvør rindar henda her kostnaðin? Tað er ikki so langt síðani, at hesir bjóðaðu sínum viðskiftafólki fleiri mánaðarlønir forút til nýtslu.

Nú er so rokningin komin, og henda samgonga hevur sett sær fyri at fremja ymisk tiltøk fyri at forða fyri enn størri hækkingum í kostnaðarstøðinum. Men sjálvur loyvi eg mær at ivast í úrslitinum av øllum teimum fráboðaðu tiltøkunum, men skal venda aftur til henda partin í seinna umfari.

Løgmaður sigur, at vinnulívspolitikkur er ikki at troka fram at landskassanum við formansins loyvi, biði um loyvi at citera. Hetta er ið hvussu so er nýggjur

tónleikur frá revisorgreipuni, og vit skulu ikki gloyma at leggja okkum hesi orð í geyma.

Fiskivinnumál. Sum áður nevnt, so er fiskivinnan, skipini serliga illa fyri, og sigur løgmaður, at framyvir verður neyðugt at fáa ein fiskiflota, sum ber seg uttan munandi almennar afturberingar. Jú, soleiðis kann tað sigast, men hevur tað skund at gera nøkur munagóð tiltøk, sum geva úrslit. Vit mugu beinanvegin fáa talið á fiskiførum á eitt støði, sum okkara fiskastovnar kunnu bera, og eigur upphøggingargrunnurin at fáast at virka, so neyðug veiðiorka verður keypt úr flotanum sum skjótast.

Royndir við uppboðssølu eiga at byrja beinanvegin, tí um vit byrja eftir íslendskum mynstri, so hava vit tær neyðugu arbeiðsumstøðurnar til hesa roynd.

Hóast møguleikin fyri fiskiskapi eitt nú eftir lodnu skuldi verið betri í 1989, nú Grønland, Ísland og Noreg hava gjørt sáttmála um henda stovn, so hevur tíverri einki borið til vegna vánaligt veður og at ov lítið hevur verið at sæð. Hetta sama hevur verið galdandi fyri bæði íslendsk og norsk veiðiskip, so her verður neyðugt við tiltøkum, um hesin flotin ikki skal fara av knóranum, tí henda møguleika kunnu hesi skip ikki verða fyriuttan, um teimum skal verða lív lagað í framtíðini.

Alivinnan er nógv útbygd og vónandi kemur henda vinnugrein at geva væl av sær sum frá líður, hetta er íð hvussu so er eitt av okkara ljósu punktum í framtíðini.

Hvat figgjarlógini fyri 1990 viðvíkur, so javnvigar hon við 3.111.000.000 í móti 3.198.000.000i 1989, men við inntøku- og útreiðslulógum, sum eru samtyktar og settar í gildi í 1989, so kemur figgjarlógin fyri 1989 upp á 3,3 mia.kr., so talan verður um eina lækking upp á 8,3%. Tá ið ein í fyrsta umfari hevur hugt figgjarlógaruppskotið í gjøgnum, so
sær viðgerðin hjá landsstýrinum nokk so tilvildarlig út. Her vil eg beinanvegin gera vart við, at tað hevur verið vanligt í fylgisskjølunum, at tá ið stovnar hava sent umsóknir inn, og landsstýrið síðani hevur viðgjørt, so hevur landsstýrið havt eina rød við sínum tølum, men

broytingarnar hava altíð havt viðmerkingar í fíggjarlógini, og tað saknar vit, um tað er ein nýggjur háttur at viðgera fíggjarlógir upp á ella, tað er líkasæla, eg veit ikki, men tað er ein stórur saknur í, at tær viðmerkingarnar mangla yvirhøvur allastaðni frá landsstýrinum.

Stovnarnir hava fingið tillutað eina upphædd í mun til 1989 at halda seg innanfyri, men fylgjurnar av niðurskurðunum eitt nú á heilsu- og sjúkrahúsjáttanunum er farið nóg so lætt um, men livst so spyrst, og fara vit báðir, sum umboða Tjóðveldisflokkin í fíggjarnevndini at geva hesum uppskoti eina gjølliga viðgerð.

Roynt hevur verið at spara á rakstrarsíðuni, sum víst verður á í fátæku viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið, so eru upphæddirnar til fiskivinnuna munandi hækkaðar, og arbeiðir landsstýrið við at fremja strukturbroytingar á fiskivinnuøkinum, ið skulu rætta teir skeivleikar, sum eru í hesi vinnu, og samstudnis gera høvuðsvinnuna effektivari við eini ætlaðari minni játtan á komandi fíggjarlóg. Hetta ljóðar alt sera gott, men eitt skulu vit gera okkum greitt, at fáa vit ikki betri prís fyri okkara útflutningsvørur við betri góðsku, við meirgóðsking og møguligum nýggjum marknaðum, so fáa vit ikki fiskivinnuna at bera seg, um framleiðslutól, fiskavirkir, skip og útgerð hava verandi kostnaðarstøði.

Eg skal gera nakrar viðmerkingar til tær einstaku greinirnar á fíggjarlógini, sum eisini er til viðgerðar. § 11 Landsfyrisitingin. Samlaðu útreiðslurnar eru hækkaðar frá 157,1 mió. í 1989 til 160,6 mió. í 1990. Her er nýggj konto 11072: Sjóvinnuráð og fyrireiking av sjóvinnu 1 mió.kr. Sjálvt um vit vita, at hetta hevur verið í umbúnað, so áttu nakrar viðmerkingar at verið frá landsstýrinum í fylgisskjølunum, ið hvussu so er, tá ein nýggj konto kemur á fíggjarlógina. Ein onnur konto á § 11 er nr. 11259: Útbygging av Elektron, við 3,3 mió.kr. Nú havi eg nakað av kunnleika til hesa ætlan frá fíggjarnevndararbeiði, men eisini her átti landsstýrið at havt nakrar viðmerkingar í fylgisskjølunum. Har kann eg skoyta uppí, at landsstýrisins partur í Elektron, partapeningurin, er lutfalsliga lítil, og minnist meg

rætt, hevur ein samd fíggjarnevnd heitt á landsstýrið um at hækka partapeningin í p/f Elektron, so tað samsvarar meira við nýtslustigum soleiðis, at vit fáa eitt orð at skula hava sagt, tá ið vit hava so stóra nýtslu har.

Ein annur konto § 12 er heilsumál. Samlaðu útreiðslurnar eru lækkaðar úr 400 mió.kr. í 1989 til 354 mió.kr. í 1990. Hjálpitólamiðstøðin er niðurskorin við 1 mió.kr., men vónandi kemur hetta ikki at raka tænastustøðið alt ov nógv og helður ikki endurnýtslustigið, sum upp á longri sikt skuldi spart seg aftur.

Nú kann eg ikki lata vera við at tríva í eina viðgerð, sum hevur verið í einum leiðara í einum føroyskum blaði í hesum sambandi, hvar ið eg sum landsstýrismaður verið lagdur undir í heimildarloysi at hava givið boð um at nýta so nógv, teir vilja, og fari eg tí at biðja formannin um loyvi at endurgeva, hvar ið leiðarin í andstøðublaðnum tí størsta sigur um hjálpartólamiðstøðina. "og hví er hesin stovnur viðgjørdur í fíggjarnevndini, var tað ikki tí, at hesin stovnur hevði nýtt pening í heimildarloysi, hevði nýtt pening, sum als ikki var játtaður, og var hetta ikki gjørt í samráð við avvarðandi landsstýrismann úr Tjóðveldisflokkinum?" Har kann eg bara siga, at hesin stovnur fekk, tá ið eg var landsstýrismaður, boð um at halda seg innan fyri játtanina, men Javnaðarflokkinum líkt, hann rósar sær av at hjálpa teimum minni mentu, skuldi tað óhapp hent, at hesi, sum kanska eru tey mest hart treingjandi í Føroyum, høvdu fingið eitt yvirtrekk, so vítt eg havi skilt til eina lyft, so skal tað verða teimum væl unt, men tað er ikki fráboðað og biðið um, at tey tóku sær henda pening.

Játtanin til Landssjúkrahúsið er skorin niður frá 244 mió.kr. í 1989 til 207 mió.kr. í 1990, Klaksvíkar sjúkrahús frá 44,8 mió.kr. í 1989 til 39,4 mió.kr. í 1990, Suðuroyar sjúkrahús frá 27 mió. í 1989 til 23,2 mió.kr. í 1990. Sjúkrahúsbygging í grunn er minkað frá 25 mió.kr. til 18 mió.kr. Sambært lógina um útbygging av sjúkrahúsunum, so skulu 25 mió.kr. setast árliga í 6 ár. Her verður neyðugt við lógarbroyting, um hetta skal verða tann upphæddin, sum í framtíðini verður avsett. Vónandi fer landsstýrismaðurin í sjúkrahúsmálum at gera

nakrar uppískoytisviðmerkingar til fátæku viðmerkingarnar frá sjúkrahússtjórafyrisitingini.

Blákrossheimið er komið sum nýggj konto á § 12 við 4 mió.kr., og hetta er nokk so rímiligt, upphæddin er vorðin stór í dag, men annars hevur henda konto fyrr ligið beinleiðis undir rakstrinum hjá landssjúkrahúsinum.

§ 13. Samferðslumál. Samlaða játtanin er á hesi § lækkað úr 314,8 mió.kr. til 269,8 mió.kr., og er størsti niðurskurður berghols- og brúgvagerð í grunn, sum er lækkað frá 61 mió.kr. til 36 mió.kr.

Tá henda samgonga varð skipað, varð semja um at halda fram við bergholsarbeiðinum Signabø-Kaldbaksbotn og Lopra-Sumba, avtalað varð, at loftið í Signabøarberganum skuldi gerast líðugt soleiðis, at møguleiki kundi verða fyri nýtslu av hesi farleið, tá ið ring líkindi eru at fara á cynna eitt nú fyri kava ella vind og vónandi kann henda neyðloysn nýtast longu í vetur, tá ið á stendur.

Undanfarna landsstýrið setti smærri upphæddir av til áboetur og breiðking av ávísum vegakervum eitt nú millum Kollafjørð og Hósvík, men enn sæst ikki, at nakað er gjørt á hesum vegi, sum fekk tillutað eina upphædd upp á 1,5 mió.kr. í 1989. Ynskiligt var, um arbeitt varð fyri ta játtaðu upphæddina, tá hesin vegur er ógvuliga vandafullur av tí, at hann er so smalur, slík arbeiði kundu gott verið boðin út til lokalar arbeiðstakarar.

§ 14. Skúlamál. Játtanin 1989 var upp á 422 mió.kr., uppskotið 1990 er upp á 393 mió.kr., so her er eisini talan um niðurskurð. Henda konto er nógv tugd í fjølmiðlunum og andstøðubløðunum, og tá okkara landsstýrismaður í skúlamálum og landsskúlastjórin alment hava viðgjørt og sakliga svarað upp á fyrispurningar og ábreiðslur frá størsta andstøðuflokkinum og -blaðnum, so skal eg bert gera fáa viðmerkingar til hesa grein.

Av nýggjum skúlum er Handilsskúlin á Kambsdali um at verða liðugur og er fyribils byrjað í leigaðum hølum í Fuglafirði. Tekniski skúlin í Klaksvík er liðugt útbygdur, hetta váru arbeiði, sum undanfarna landsstýrið setti í gongd. Skúlin fyri fiskiídnað og havbúnað í

Norðstreymi er byrjaður virki sitt í Vestmanna. Føroya maskinskúli kann nú fara undir projektering og bygging av hesum skúla kann byrjað í 1991 í Havnini.

§ 15. Vísind, bókmentir og list er sett til 97,2 mió.kr. í 1990 móti 123,1 mió.kr. í 1989. Broytingin stavar fyrst og fremst frá minkandi rakstrartølum, tó er eisini nakað minni lagt í ávísar grunnar.

Fróðskaparsetur Føroya er skorið niður frá 14,6 mió.kr. til 12,4 mió.kr., men kunnu vit síggja í viðmerkingunum í hesum førinum, at henda lækking er gjørd í samráð við Fróðskaparsetrið, so vónandi darvar hesin niðurskurður ikki virkseminum har alt ov nógv.

Skúlabókaútgáva er skorin niður frá 4,9 mió.kr. til 4,4 mió.kr., men hevur Føroya skúlabókagrunnur gjørt fíggjarætlan fyri 1990 innan teir karmar, sum landsstýrið hevði sett. Frágreiðing um hetta er bræv frá Skúlabókagrunninum, sum liggur á fylgisskjølunum, so vónandi verður virksemið hjá grunninum nøkulunda á sama støði, sum í 1989.

§ 16. Fiskivinna og sigling er samanlagt 555,8 mió.kr. móti 424,6 mió.kr., sum samtykt í 1989, men sum kunnugt eru nakrar broytingar farnar fram í hesum árinum. Størsta økingin er minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna, sum er sett til 454 mió.kr.

§ 17. Landbúnaður og matrikulering. Kontoin er lækkað frá 51 mió.kr. í 1989 til 46 mió.kr. í 1990, her er talan um lækkingar av bæði rakstrar- og studningstølum.

§ 18. Handil og iðnaður o.t. er lækkað frá 50 mió.kr. til 44,8 mió.kr. Vit kunnu siggja í fíggjarlógini, at Arbeiðseftirlitið úti á bygd er sett undir cina konto saman við Havnini, hvi tað er gjørt, kundi verið áhugavert at fingið at vita frá avvarðandi landsstýrismanni.

Eisini fari eg at spyrja landsstýrismannin í orkumálum, um streymmátingarnar í samb. við ætlaða streymorkuverkið í Vestmannasundi halda fram, og nær tær væntast at verða lidnar.

§ 19. Almannamál er sett til 820 mió.kr. í 1990, sum er nærum sama upphædd sum í 1989, sum var upp á 819

mió.kr.

Saman um tikið er roynd gjørd at spara á teimum ymisku kontounum á fíggjarlóginí, og vilja vit í fíggjarnevndini royna at fylgja hesum sikti upp uttan tó, at hetta skal fáa álvarsligar avleiðingar fyri smærru og miðalinntøkurnar. Somuleiðis fara vit at viðgera spurningin, um inntøkulógirnar og tvungna uppsparing raka tey, sum hava sett búgv og sita við dýrum lánum, tí sum kunnugt, tey sum spara upp til at gjalda húsalán, tey hava sína uppsparing, og tað má ikki ganga út yvir tey so mikið, at tey verða tað í afturhond, at tey sita í vanda fyri at missa hús og heim. Í hvussu so er vil Tjóðveldisflokkurin taka henda táttin upp í fíggjarnevndini og fáa hann betri lýstan.

Eg skal ikki gera stórvegis viðmerkingar nú til undanfarna røðara, men tá ið tað verður tosað um tjóðskaparlig rakstrarróp frá einum javnaðarmanni, so má eg bara siga tað, at Guð gævi, at Javnaðarflokkurin tosaði um tjóðskaparmál og um loysing, men at halda fram at billa fólki inn, at teir eru tjóðskapar sinnaðir, tað røkkur ikki langt, tá ið teir ongantíð vilja hava sína egnu tjóð. Tað er einki við at vera tjóðskaparsinnaður og ikki fáa sína egnu tjóð. Tjóðveldisflokkurin er kanska farin saman við øðrum sambandsflokkum enn Javnaðarflokkinum hesu ferð, men tað er ikki minst fyri, at vit skulu styrkja um okkara búskap, so vit kunnu standa á egnum beinum sum egin tjóð. Tá ið tað verður tosað um høgrasnaring, so kann eg bara vísa á, at tað var eingin, sum undir valstríðnum hjálpti so væl til ta høgrasnaring, sum nú kanska onkur metir er komin, sum Javnaðarflokkurin við at bjóða Fólkaflokkinum einsamallum Fólkaflokkinum inn til valfundir. Hetta eydnaðist so væl, at Fólkaflokkurin fekk tað burtur úr ti, sum Javnaðarflokkurin ynskti, men tá ið teir ætlaðu sær saman og ikki sluppu, tað miseydnaðist, tað harmaði Javnaðarflokkin mest. Takk fyri.

Formaðurin

Síðan er døgurðasteðgur, og so verður fundurin upp

aftur tikin kl. 14.00.

Tordur Niclasen (kfff.)

Harra formaður.

Tað er sum kunnugt røða løgmans á ólavsøku og fíggjarlógaruppskot landsstýrisins 1990, ið eru til viðgerðar.

At hesi bæði verða viðgjørd undir einum, er eftir míni uppfatan helst skilagott, tá fíggjarlógin í stóran mun er í kr. og oyrum tað, sum framborið er av løgmanni í síni ólavsøkurøðu ella rættari sagt átti at verið tað.

Harra formaður. Undir vanligum umstøðum skuldi fíggjarlógaruppskotið nú havt ligið í fíggjarnevndini í 2 vikur og viðgerðin nú av álvara verið byrjað, men sum øllum kunnugt, so var henda viðgerð útsett orsakað av, at Tjóðveldisflokkurin fyrst vildi hava 2 mál avgreidd, áðrenn henda viðgerðin fór fram nevnliga skúlamálið í Vági væl at merkja avgreidd eftir teirra uppskrift, og at skrivingin í Dagblaðnum tagnaði. Harra formaður. Tað má við sorg ásannast, at tað hevur eydnast teimum í báðum førum. Skúlastjórin er ikki har longur, løgmaður lat seg trýsta, og Dagblaðið er tagnað.

Einki undantak fyri hesa løgmansrøðu er, at búskaparstøða landsins fær rúm og at víst verður til aktuel búskapar- og fíggjartøl. Fyrsta talið, ein í hesi løgmansrøðu man verður enn eina ferð kunnaður um, er uttanlandaskuldin. Her verður ásannað, við formansins loyvi, at størsti skelkurin av búskaparligu støðu samfelagsins var, at uttanlandaskuldin við árslok 88 var uppgjørd til 6,7 mia.kr. og ikki sum áður beint undan seinasta løgtingsvali upplýst tær 4,7 mia.kr., sum so nógv vóru umrøddar. Loksins í hesi talu løgmans verður so sagt, at hesir 3 flokkarnir Sambandsflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin eru gingnir saman fyri at taka saman hendur fyri at endurreisa føroyska búskapin og fyri at fáa samfelagshjólini aftur at mala og at mala rætt. Hetta er tað, sum m.a. Tjóðveldisflokkurin ásannar um búskaparstøðu landsins, at harn liggur í

sorli also búskapurin, og tí er neyðugt at endurreisa. Eg skal her ikki leggja meg út í tjakið, sum verið hevur millum Sjálvstýrisflokkin og Tjóðveldisflokkin, har hesin skuldsetir Sjálvstýrisflokkin og tað mangan kanska av røttum at hava oyðsla undir seinasta landsstýri, men bert seta ein einfaldan spurning, hvør var tað, sum í tíðarskeiðnum 85-89 umsat fíggjar- og búskaparmál í landsstýrinum og harvið hevur høvuðsábyrgdina av, at búskaparstøða- og fíggjarstøða landsins í dag er tað, hon er?

Politikararnir hava ábyrgdna, verður mangan sagt og tað er rætt. Hvat tí alt ov stóru uttanlandsskuld viðvíkur, hevur nýliga verið ført fram, at tað almenna bert eigur lítlan part av hesi skuld, nevniliga 250 mió.kr., meðan tað er tað privata, sum er tann stóri skuldarin. At so er, eigur ikki at nýtast sum umbering og frítekur ikki politiskan myndugleika, tí her eigur at havast í huga tann kapitalstreym, sum so at siga óstarnaður er komin inn í landið.

Í undanfarnu samgongu gjørdu vit vart við, og tað fleiri ferðir eisini á samgongufundum, at tað var ógagnligt fyri ikki at siga beinleiðis skaðiligt fyri land okkara, at hesin peningur soleiðis floymdi inn yvir okkum uttaneftir. Fíggjað eitt yvirupphitað byggivirksemi, sum umframt at hála fremmanda arbeiðsmegi til landið í stóran mun drenaði okkara høvuðsvinnu fiskivinnu fyri fólk. Landssstýrið hevði møguleikan fyri at avmarka ein stóran part av hesum lánum, men lat standa til. Hetta var í teimum døgum tó minni enn eitt ár síðani, at flokkurin, sum umsat búskapar- og fíggjarmál, reypaði óført um køna stýring, og at allir grunnar stóðu at bresta, og at gjaldføri landskassans ongantíð hevði verið betri. Í dag so stutt eftir, at reypini um køna fíggjarpolitikkin er tagnað, er tað av røttum, at veljarin spyr, hvat var í øllum hasum reypinum? Veruleikin er í eyguni ein uttanlandsskuld 2 mia. hægri enn upprunaliga áðrenn valið sagt frá, at gjaldføri landskassans, sum hevur fingið nýliga fyrstu hjálp úr danska nationalbankanum. Ikki so løgið, at Sambandsflokkurin setti sum avgjørda treyt fyri samgongu starvi,

at hann skuldi hava fíggjarmál um hendi.

Eitt tað fyrsta bragdið hjá hesum trimum flokkum og í hesum føri við Sambandsflokkinum á oddi var at sveiggja pískin soleiðis, at tað sveið eftir í. Vanligi arbeiðsmaðurin, verkamaðurin, skuldi nú fáa stein oman á byrðu, vanligi løntakarin skuldi nú revsast og dragast til svars fyri gerðir, hann als ikki var sekur í. Henda herferðin móti fiskimanninum og vanliga løntakaranum var rættvísgjørd við orðunum, at nú var neyðugt við heilt serligum tiltøkum fyri at venda búskaparligu gongdini rætta vegin. Inntøkulógirnar vórðu samtyktar við 19 atkvøðum (2 vóru burturstaddir) úr samgonguni.

Onkur hevði helst sett vón sína til, at tann flokkur, ið segði seg at vera verja verkamansins, Tjóðveldisflokkurin, at hann ið hvussu so er ikki vildi ganga við til, at vanligi løntakarir skuldi kenna sviðan soleiðis, sum inntøkulógirnar bóru boð um, men ak nei. Har vóru bert tóm orð og tóm lyfti. Av Sambandsflokkinum var sokallaði Tjóðveldisflokkurin bukaður upp á plass, ja, hann hevði lagt seg skerflatan fyri í hesi samgongu at náa síni hægstu ideologisku mál, nevnliga at fáa avhøvdað ein fríkendan skúlastjóra og fáa ein ávísan skúla fluttan nakrar 100 metrar, og so mátti verkamaður vera verkamaður, og so mátti tann láglønti, sum framman undan hevði torført við at fáa endarnar at røkka, sigla sín egna sjógv og merkja, at steinur varð lagdur oman á byrðu.

Inntøkulógirnar komu aftur úr fíggjarlógini, og mælti umboð samgongunnar til at samtykkja uppskot landsstýrisins, og eg haldi, tað er rætt her at nevna, at millum henda meiriluta í fíggjarnevndini vóru bæði umboð Tjóðveldisfloksins Jógvan Durhuus og Heini O. Heinesen

Eitt av hesum amboðum, sum samgongan vildi nýta til tess at fáa búskapin aftur á føtur, sum sagt varð, var eykaskatturin við afturvirkandi kraft til 1. januar 1989, tað, sum teir kanna bundna uppsparing. Hesin eykaskattur kom at umfata iønir heilt niður til 110.000 kr., við hesum uppskoti var 50% skattamarkið brotið, sjálvt um Fólkaflokkurin í arbeiðsskrá síni ti seinast revideraðu væl at merkja sigur, at haldast eigur fast um 50%

markið, men í stevnuskrá teirra sigur Fólkaflokkurin, at hann vil framhaldandi arbeiða fyri, at skattabyrðan gerst rættvísari. Kanska er hetta teirra uppfatan av eini rættvísari skattabyrðu, at tann láglønti verkamaðurin skal rinda upp aftur meira í skatti og harvið størri í størri mun enn áður verða við til bera samfelagsbyrðarnar.

Vit í Kristiliga fólkaflokkinum halda ikki hetta vera rættvist. Vit halda tað heldur ikki vera rætt at taka pening frá fólki við afturvirkandi kraft, og at hesin peningur ikki verður afturgoldin, fyrr enn skattgjaldarin er vorðin 65 ára gamal. Tí var tað eisini, at vit løgdu fram broytingaruppskot, har hildið var fast við fyri tað fyrsta, at varðveita 50% markið, fyri tað næsta, at lág- og miðalinntøkurnar ikki komu undir skipanina, fyri tað triða, at lógin ikki hevði afturvirkandi kraft og fyri tað fjórða, at skattgjaldarin fekk peningin aftur innan 2 ár við fullari rentu. Tíverri vann okkara uppskot ikki frama, men har aftur í móti uppskot landsstýrisins, og vit skilja væl og taka fult undir við arbeiðarafeløgunum runt kring landið, har hesi harðliga hava mótmælt, tí í veruleikanum er henda eykaskattarokning størsta revsingarferð í móti vanliga lønmóttakaranum kanska nakrantíð.

Her er talan um tiltøk, sum tileinkisgera tær lønarábøtur, sum semja var um í mei mánaða míllum arbeiðarafeløgini og Føroya arbeiðsgevarafelag, her er talan um tiltøk, sum í stóran mun taka fíggjarstøðið undan mangari familju kring landið. Her er talan um tiltøk, sum økja skattatrýstið í so stórt mát, at
áræði og hugur til verka kann hugsast at fjara ella, at hetta stimbrar til tað, sum eitur svart arbeiði.

Harra formaður. Tað er nógv, sum týður upp á, at landsstýrið ella rættari sagt samgongan ikki hevur givið sær far um avleiðingarnar av hesum tiltøkum. Sambært løgmansrøðuna eru hesi sokallaðu búskapartiltøk bert ein byrjan av teimum byrðum, sum leggjast skulu á herðar teirra, sum framman undan hava nóg mikið at bera. Løgmaður saman við Tjóðveldisflokkinum hevur jú boðað frá, at lógin um prístalsviðgerð skal avtakast.

At koma við slíkum uttalilsum beint eftir, at inntøkulógirnar eru farnar at virka, er meira enn djarvt ja, ein loyvir sær at kalla tað næsadjarvt. Á somu síðu í løgmansrøðuni verður tosað um týdningin av friði á arbeiðsmarknaðinum, tað má metast at vera naivitetur í hægsta potens.

Upp á forhond vilja vit sum flokkur mótmæla av tí harðasta, at tað so mikið sum hugsað verður um at tyngri byrðar verða lagdar á herðar arbeiðsmansins, og at hann soleiðis verður knokkroyttur. Nei, sendið rokningina, har hon hoyrir heima, tí tað er ikki vanligi arbeiðsmaðurin ella -kvinnan, ið stríðist á ymiskum arbeiðsplássum kring landið, ei heldur er tað fiskimaðurín, ið baldrast á sjónum, ið eigur uttanlandsskuldina ella er orsøk til búskaparstøðu landsins, ið hvussu so er hevur henda samgonga tveir menn, ið hava allar fortreytir fyri at vita, hvør ið veruliga eigur rokningina, høvdu teir bara vist vilja, so var rokningin ikki send til aðrar enn, har hon hoyrði heima.

Her fari eg at loyva mær at lesa eitt lítið brot úr eini grein, sum ein skilamaður, sambandsmaður, hevur gjørt viðmerkingar til, við formansins loyvi, har hesin sigur: "Tann upphædd, tit nú taka beinleiðis frá fólki, er umleið sama upphædd, sum hesir skattalættar", so vísir hann til 75-80 mió., "so kemur løgmaður við einum yvirberandi smili inn í hvørja stovu í Føroyum og sigur, at skattaspekulatiónin í uttanlandslánum er so lítil, at hetta er ikki vert at tosa um. Vit kenna jú grannskoðaravirkini, tey størstu hava meira enn 100 fólk í arbeiði tilsamans, ið milium annað stýra mangari hálendisskútu trygt í gjøgnum skattalógirnar". Hetta er ein maður, sum hevur skil fyri tølum, og hann veit, hvat hann tosar um.

Harra formaður. Eg eri ikki ósamdur, og tað trúgvi eg ikki, nakar tingmaður er, at búskaparstøða landsins er alt annað enn góð, og at tað tí eisini er neyðugt við ávísum tiltøkum, tað hava vit ongantíð avnoktað, ongantíð. Eisini við sparingum á løgtingsins fíggjarlóg, men tað kemur fyri, at samgongumenn í rossahandlum her og der eru farnir til verka uttan á nakran hátt at hava

givið sær far um avleiðingarnar at ætlaðu tiltøkunum, og komur hetta eina mest til sjóndar í fíggjarlógaruppskotinum, sum eg seinni skal venda aftur til.

Atferð samgongunnar í hesum tiltøkum kann samanlíknast við ein skuralækna, sum sker við bindi fyri eygunum. Ein og hvør kann hugsa sær úrslitið av slíkum framferðarhátti, íð hvussu so er, vildi eg ikki verið sjúklingurin, ið lá undir hansara hond.

Tað stendur rimmar fast, at avleiðingarnar av longu nevndu tiltøkum og ætlaðu tiltøkum landsstýrisins koma at raka tey veikastu og tey, sum framman undan hava nóg mikið at knossast við. Her er so knortlut farið til verka, at vandi er fyri, at samfelagshjólini steðga. T.d. verður ein avleiðing av ætlaðu tiltøkum landsstýrisins tann, at longu í vetur og til várs fara út í móti 1.000 fólk innan byggi- og anleggsarbeiðið at verða arbeiðsleys, og kann ein her av røttum spyrja, hvussu ætlar landsstýrið, at hesi skulu breyðføða seg?
Hvar skal tann neyðuga inntøkan koma frá, sum skal til fyri at gjalda rentur og avdrag hjá hesum fólkum, tann neyðuga inntøka, sum skal gjalda mat, klæði o.a. neyðugt í húsarhaldinum til børnini og avvarðandi teirra, og hvar skal tann neyðuga inntøkan koma frá, ella er tað ætlan landsstýrisins, at býta út ferðaseðlar væl at merkja einvegis ferðaseðlar til fólk soleiðis, at tey í hópatalí kunnu ferðast ella flúgva út av landinum?

Í mong ár hava sosialistisku kreftirnar roynt at fingið arbeiðsloysisgrunn, arbeiðsloysisstuðul innførdan her á landi. Tað hevur ikki eydnast higartil og tí betur, men nú tykist, at tað fer at eydnast fyrst við politiskum tíltøkum at skapa arbeiðsloysi, síðani at rættvísgera, at nú er neyðugt at varðveita arbeiðsloysisstuðul, og er tað her, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin fara at geva Tjóðveldisflokkinum høvi seinni at taka sær æruna av, at tað var hann, hin sokallaði vinur verka- og arbeiðsmanna, sum innførdi arbeiðsloysisstuðul her á landi. Eftir øllum at døma fæst Fólkaflokkurín til alt, tí Sundstein, løgmaður, hevur sett sær fyri at sita í løgmanssessinum fyri ein og hvønn prís, hetta hava vit longu nú døpur prógv um, og

sum kunnugt kann stevnuskrá Fólkafloksins jú altíð við stuttum skotbrái prentast av nýggjum og sendast út í broyttari útgávu.

Tá ið so alt hetta byggivirksemið er steðgað, hvat vilja tit so gera við tann hóp av lærlingum, sum tá standa uttan læruplóss. Harra formaður, eg nevni orðið steðga, eg tosi ikki um at niðurseta byggivirksemið. Tað er í lagi, at tað mái eitt ávíst mát niðursetast, men her er talan um so greflig tiltøk, sum hava hesar avleiðingarnar við sær. Hvat vilja tit tá gera við hesar lærlingar? Hetta eru relevantir spurningar, tí vinnur ætlaði politikkur tykkara frama, ja, so er tað tit, ið upp á rekord tíð koma at skapa ta størstu kreppu, land okkara kanska nakrar tíð hevur kent til, hví? Tí tit høvdu ikki gjørt tykkum greitt avleiðingarnar av ætlaðu tiltøkum og lurtaðu ikki eftir teim úti í vinnuni, sum høvdu fingurin á pulsinum.

Harra formaður. At stuðulin tíl fiskivinnuna á figgjarlógini er hækkaður við heilum 129 mió.kr., má undir verandi umstøðum metast sum eitt neyðugt tiltak. Her eigur at sláast fast, at her er talan um eina afturbering til okkara høvuðsvinnu, sum í veruleikanum er hon, ið er stuðulin undir øllum virksemi og øllum trivnaði her á landi.

Í løgmansrøðuni verður tó sagt, at framyvir er tó neyðugt at fáa ein fiskiflota, sum ber seg uttan munandi afturberingar. Hetta er málsetningur, sum mangan áður er havdur á lofti. Neyðugt verður tí eisini við tiltøkum at náa hetta endamál. Veiðiflotin hevur leingi verið ov stórur og einki at ivast í, at teir sokallaðu skipapakkarnir ikki hava bøtt um hesa støðu tvørturímóti.

Nú tykist, at skipanin við upphøggingarstuðulinum er farin at virka, tó kundi ein ikki annað enn býta merki í, at úr landsstýrinum varð sagt í gjárkvøldið í útvarpinum, at upphæddin til hetta endamál á figgjarlógini kom ikki at sláa til, og varð tí neyðugt við peningi uttaneftir. Hvussu samsvarar hetta so við viðmerkingarnar hjá landsstýrismanninum í figgjarmálum, har sagt verður, at tað er ikki ætlanin við lántøku til fyriliggjandi figgjarlógaruppskot? Úr landsstýrinum verður

sagt, at strukturbroytingar verða at fremja, at studningsskipanin verður endurskipað. Stórvegis nærri verður ikki komið inn á ætlaðu broytingar.

Harra formaður. Tá undanfarna samgonga varð skipað løgdu vit áherslu á og fingu við í samgonguskjalið, at tá lógin um ráfiskagrunn og reglurnar annars um studningsskipan skuldu endurskoðast, skuldi hetta m.a. gerast við tí fyri eygað, at fiski- og útróðrarmaðurin fekk løn sína útgoldna í einum, og hvat var meira nátúrligt? Tíanverri má ásannast, at sum skipanin virkar í dag, er tað heilt burturvið, hvussu leingi fiski- og útróðrarmaðurin má bíða, til tað, hann eigur til góða, kemur honum í hendi. Her má og skal vend koma á. Vónandi er hetta við í teimum broytingum, landsstýrið ætlar at fremja á hesum øki, kanska avvarðandi landsstýrismaður kundi svarað upp á tað.

Eisini er at vóna, at landsstýrið við ætlaðu broytingum á fiskivinnuøkinum tekur hædd fyri, at tað skal loysa seg at avreiða dygdarvøru, ella við øðrum orðum, at prísurin fyrí landaða veiðu verður givin eftir dygdini á vøruni. Tað er nokkso grundleggjandi, um so er, at vit skulu tosa um at hækka útflutningsvirðið á hesi vøru.

Harra formaður. Ein onnur vinna, sum á størri og størri mun kemur at hava búskaparligan týdning og longu hevur havt tað, er alivinnan. Hóast hesi vinnu hava verið mong bakkøst fyri, so hevur tó við áræði, vilja og hegni eydnast monnum at fáa so frægt burturúr, sum úr er komið. Tó er tað eingin loyna, at henda vinna í dag fíggjarliga er illa fyri. Í løgmansrøðuni verður sagt m.a. í samb. við hesa vinnu, at virkað verður fyri at útvega neyðuga fígging, og at fíggjarlig ráðgeving til alararnar verður stuðlað. Harra formaður. Ikki er tørvur bert á neyðugari fígging men eini figging, sum vinnan orkar at bera ella við øðrum orðum ein fígging, hvørs rentubyrða er minimal. Og her er tað, at eg loyvi mær at spyrja avvarðandi landsstýrismann í alimálum, hvønn leiklut, landsstýrið hevur ella hevur havt í einum stórum fyrimyndaligum uttanlandsláni, sum alivinnuni hevur staðið i boði.

Harra formaður. Tíðin hjá mær er við at verða farin, og komi eg seinni inn á sjálva fíggjarlógina hjá landsstýrinum.

Tó loksins má sigast at tað eru nakrar grundleggjandi meginreglur, sum eitt og hvørt samfelag, eitt og hvørt demokratisk samfelag eigur og má varðveita fyri at rættartrygdin í samfelagnum skal verða varðveitt soleiðis at borgarin skal føla seg tryggan, tað kemur mær fyri harra formaður, orsakað at hendan samgongan ella rættari sagt partur av landsstýrinum hevur við avgerð nýliga tikin, hevur sett rakað í verk, sum er við at máa støði undan okkara rættartrygd. Tað var ein leiðari á einum fólki, sum einari fer fekk at vita, at tú mást ikki boyggja rættin, ikki gera mannamun og takað ímóti mutri, tí mutur blindar eygu vísmanna og vendir søkini við ikki at rættvísa. Hetta er ein meginregla harra formaður, sum ikki er farin úr gildi, og tað má við sorg sannast, at tá ið løgmaður hevur gingið við til at avrætta fríkendan mann her á landi, so má sigast at hann hevur tikið við mutri soleiðis at skilja, bert fyri at sleppa at sita trý ár afturat í sínum løgmanssessi, og tað er harmiligt, og tað er ein hóttan móti rættartrygdini og tað er við til at takað lunnarnar undan einum vælskipaðum rættarsamfelag, takk fyri.

Fundur niðurlagdur og uppaftur tikin kl. 14°°

Fundur uppaftur tikin

<u>Lasse Klein</u> (sj.)

Harra formaður.

Tá vit nú hoyra samgongumenn røða um fíggjarlógaruppskotið fyri 1990, sovítt er tað eisini galdandi í samband við løgmansrøðuna á Ólavsøku, so kom eg at hugsa um orðatakið sum sigur: "At fanatikarin er tann sum kýtur seg tvífalt, eftir at hann hevur mist málið úr eygsjón". Bæði sjálvt fíggjarlógaruppskotið og eisini framsøgumenn samgongurnar hava til fulnar prógva hetta, ikki minst orðadrátturin sum verið millum sam-

gongumenn í bløðunum hava eisini prógva hetta, her er tað kunnugt tingmaðurin fyri norðyggjar Heini O. Heinesen, sum skarar fram úr, hann tykist verða óður inn á alt og øll, hann er óður inn á samgonguna, hann er óður inn á andstøðuna, Dagblaðið, Óla Breckmann, hann er óður inn á Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin, hann er óður inn á sítt egna landsstýri og sín egna tingbólk Alt kann sjálvsagt henda tá menn gerast óðir, men ta hevur formaðurin vónandi tikið hædd fyri, ið hvussu so er seinni í hesum orðaskiftinum.

Vit kunnu øll verða samd um at revsingarferðin í móti skattgjaldarum landdsins er hernað munandi ævið fíggjarlógaruppskotinum fyri 1990, inntøkulógirnar vóru eitt og nú heldur so fíggjarlógaruppskotið fyri 1990 fram, og eg hugsi at jarnhæsurin talar sítt tíðuliga mál. Tað er einki at siga til, at fólk hava eyknevnt hetta fíggjarlógaruppskotið fyri 1990 daprasta fíggjarlógaruppskotið í Føroya søgu.

Tað var framsøgumaðurin fyri Fólkaflokkin Anfinn Kallsberg, sum væl eisini undirbygdi hend pástand, hann tosaði um, at landsstýrið ger royndir, hann líkasum ivaðist um samgongumenn fóru nú at standa saman um hetta fíggjarlógaruppskotið og hann tosaðk um ruðuleika, hann tosaði um kaos, og so kom hann fram við nøkrum øðrum, sum eg ikki ordeliga skilti hvat tað var fyri nakað, hann kom við einari samanbering frá fíggjarárinum 1984/85 og so til støðuna í dag, hann tosaði millum annað um Strandfara skip landsins, at har vóru hækkingarnar ikki so stórar, og tað eru fyri sovitt rætt, undanfarna samgonga royndi haraftur í móti, hon royndi at hækk tænastu støði, og harvið eisini inntøkugrundarlagi hjá stovninum, tað eydnaðist í fullan mun kunnu vit siga í dag, inntøkurnar hækkaðu, ja í 1984/1985 tá vóru inntøkurnar upp á 44,7 mió.kr. og í 1988 vóru tær komnar uppá 62,7 mió.kr., tað vil siga, ein hækking eftir 4 árum upp á 18 mió.kr. í meirinntøku. Lat okkum so hyggja eitt lítið sindur eftir hvussu útreiðslurnar vóru hjá Strandfaraskip landsins, meðan Fólkaflokkurin umsat hetta málsøkið. Í 1982/83 tá var hallið 18,1 mió.kr. kr., og tað eydnaðist teimum at vaksa um hallið í

1984/85, tá í teir løgdu frá sær upá 44,7 mió. kr. ella 26,5 mió. kr. eftir trimum árum, tá kláraðu teir í hesum sama líðarskeiðinum at lækka inntøkurnar. Í 1982/83 vóru tær 59,2 mió. kr. niður í 41,2 mió. kr. ella eina minni inntøku eftir trimum árum uppá 18. mió. kr.. Hettar er loksins fólkaflokspolitikkur í dag.

So var tað Tordur Niclasen sum ongartið kann bara sær, hann tosar um sjálvstýrisflokkin oysl, og so punktum so vil hann líkasum ikki fara víðari í orðaskiftinum, og heldur líkasum at tá er alt sagt. Eg haldi at Tordur átti at lagt aftursat, at í samband við tyrlutænastuna, tá eigur at verða nevnt, at síðani tyrlutænastan fekk nýggja tyrlu hevur tað almenna spart umleið 2,5 mió. kr. árliga, tað vil siga einar 5 til 6 mió. kr. síðani Vipan varð keypt, og tær útreiðslurnar høvdu annars verið brúktar til bakkupp avtalur. Hettar í sær sjálvum er ein velduga stór sparing, somuleiðis er eisini vert at nevna í hesum sambandi, at tann tyrlan sum tá varð keypt, varð keypt fyri helvtina minni enn hin tyrlan sum varð keypt í 1984, hevði flogið nógv minni tímar og var nógv yngri.

Eg kundi eisini hugsa nær at komi inn á aðrar spurningar í samband við Strandferðsluna, men teir spurningar komi eg so aftur til.

Harra formaður. Tingið er nú á enda komið saman, kunnu vit siga til at viðgerða fíggjarlógaruppskotið fyri 1990, sum má at verða gjørt av mest fólkaheiðsku samgonguni nakrantí, hettar er skoðsmálið av tí uppskoti sum fyriliggur í dag. Hvørt einasta fólk í Føroyum uttan bara teir í "Nálastriputu, almenna klientarnir" hava følt jarnhælin hjá hesi samgonguni. Umboringarnar tróta ikki, talan er á ongan hátt um at bjarga nøkrum sum helst búskapi yvirhøvir, endamálið er nakað heilt annað. Øll hava vit hugt eftir meðan lummarnir hjá fólki verða tømdir og at teir nálastríputi í samfelagnum strúka avstað við penginum, sum annars skulu brúkast til at gjalda tær mest átrokandi roknингarnar hjá fólki.

Vit hava fingið prógv fyri, at flestu áheitarnir um hjálp úr landskassanum stava frá fyritøkum. Men tað mugu samgongumenn sjálvir varða av, og nú fíggjar-

lógaruppskoti er komið á tingborð sæst tíðuliga, at t.d. politisk upplýsing ikki skal skerjast á jøvnum føri við aðrar útreiðslupostar, men vit siggja samstundis at bíðipeningruin til tingmenn og landsstýrismenn skal hækka. Hettar má metast at verða skammiligt í hesum tíðum, og eg siggi at Olaf Olsen, landsstýrismaður hevur smíli uppá og eisini av góðum grundum, bara handan skerjingin hevði merkt fyri føroyska samfelagið, vit høvdu spart einar 20 mió. kr. eftir fýra árum, og tí verður neyðugt at takað uppaftur og aftur eisini í samband við hettar orðaskifti, hví byrðjar samgongan ikki at spara her í tinginum, hví skulu øll onnur í hesum samfelagnum koyrast í óføri áður enn ting- og landsstýrismenn. Tit hava sagt at inntøkulógirnar bara koma at raka fast í eitt ár, aftur her tikist sannleikin langt burturi av leið, tí landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur sagt við sjónvarpið, at hann ikki vildi lata eyðræningina vara í eitt ár, men í tvey ár, í tvey ár harra formaður.

Hendan samgongan hevur brúkt sum umbering fyri at mergsúgva føroyingunum, at undanfarna samgonga framdi so nógv yvirtrekk, men harra formaður hetta er sjálvsagt, sagt uttan at hettar hevur nakað sum helst við verðuleikan at gera, men ein sannroynd má tað verða, at tingmenn hava ringt við at halda seg til sannleikan eisini tá teir umtala heimildar loysi hjá t.d. hjálpartólamistøðini ella t.d. tollstovuni eru tjóðveldisfólk uupí, so eitur tað ikki heimildarloysi, men so eitur tað bert vanligt avgreiðslu mál.

Verður tunnilin gjørdur til Kunoyar, ja harra formaður so ropar Heini O. Heinesen tað fyri yvirtrekk sum ongantíð skuldi verið framt skilji tað ið skilja kann. Hví hendan samgonga ikki kann koma við sparíngum, har allir samgongumenn eisini eru umfataðir er fyri mær sera sera ørkymlandi, tí sjálvandi skulu vit í tinginum verða fyrimynd fyri allari sparing. Alt annað er bæði ómoralskt og mannminkandi.

Hvat siga Eysturoyingar til at missa sjúkatænastuna
sum hendan samgongan hevur samtykt í hesum fíggjarlógar-

uppskotinum og hvat siga teir til at vóru neyðugar spariingar framdar í tinginum, so kundu bæði sjúkraflutningstænastan í Fystuvoy og mangar aðrar nattúruligar tænastur sloppi undan spariknívinum.

At verkafeløgini ikki kunnu góðtaka at lønirnar minka er sera skilligt. At tey ikki kunnu góðtaka tey uppskot, sum vóru samtykt her fyrr í ár, tað er eisini sera skilligt, serliga tá í lønirnar hjá lands- og tingmonnum skulu hækka, í hvussu so er eftir hesum fíggjarlógaruppskotinum at døma. Tað sum í roynd og verðu er hent hesa seinastu mánaðarnar er, at revar eru sloppnir í føroyska høsnagarðin, men mótvegis øðrum revum so eta hesir ikki høsnini beinan vegin, teir bíða heilt einfalt eftir, at gulleggini eru vorpin.

At fleiri føroyingar hava boðað frá at endarnir ikki strekkja, leggja hesi samgongufólk einki í, og serliga man ørkymla fólk sum í síni tíð høvdu álit á tjóðveldisflokkinum, sum nú heldur at skúlar skulu byggjast á hvørjum tanga áður enn føroyingurin, verkamaðurin, fiskimaðurin skal hava mat í munnin.

Tit hava í verðumleikanum skorið djúpt niður í almannaveitingunum uttan at gáa eftir at inntøkulógir tykkara fara at skapa kaos og fleiri sosialar taparar, og eisini á kjalavørrinum av 1990 uppskotinum verður støðan uppaftur verri. Vit mugu viðganga, og vit hava áður sað, at almennalóggávan verður missbrúkt. Nú eru vit øll vitandi um at hetar endurtekur seg, meira umfatandi enn nakrantíð.

Ætlanin við almannalóggávuni var ikki, at nálastríputi ríkmannakropparnir skuldu gera sær dalt av henni, men at hon varð ætlað niðurundirkomnum føroyingum. Tit hava tikið gleðina frá fólki at arbeiða, tit hava byrt uppundir at føroyingar heldur vilja arbeiða svart og tað grefligasta av øllum: tit bjarga ongari fiskivinnu, tit bjarga ongum búskapi og tað hevur heldur ongantíð verið ætlanin. les bara viðmerkingarnar til fíggjarlógaruppskotið fyri 1990, har stendur ikki eitt orð um nakað sum helst.

Ætlanin hjá tykkum er at tey múgvandi, í hesum landi skulu verða meira múgvandi, og tann fátæki skal

søkka longur niður í tann sosiala kviksandin.

Eingin flokkur á tingi hevur sæð so svart uppá svartkjaftin sum fólkaflokkurin. Í dag vita vit at fyrrverandi formaðurin í fíggjarnevndini hevur umsókn um fáa slíkan við vælsignilsi frá landsstýrinum frá landsstýrinum. Ja sannliga mugu vit viðganga, at hendan samgongan dregur svart, og tí liggja eisini svørt skýggj yvir hetta land og tað kann verða at úlvar og revar, at teir hava fleiri holur, men ein dag tá dregur deymurin av illavorðnum gerðum allar sum ein út úr holini. Franska kollveltingin er eitt dømi um, at yvirvøldin ikki megnaði at kúa fólkið uttan sjálv at missa høvdi. Vit hava sæð dømir um tað entá í sjónvarpinum. Í dag rør samgongan upp undir, júst somu kúan, við tí uppskoti sum fyriliggur til viðgerðar í dag og inntøkulógunum ikki minst, samgongan eftir uppskoti frá millum øðrum tjóðveldisflokkinum ætlar at seta lønarstegð í verk, bara ikki hjá ting- og landsstýrismonnum, samstundis sum teir siga, at ongin skal verða verri fyri. Sjálv um føroyingurín ikki fær seg mettan undir hesi samgongu, so skal ongin í tingsalinum halda harra formaður at føroyingurin vil svølgja ein so stórari ligusøgu sum hesari.

Hvat hevði so sjálvstýrisflokkurin gjørt um hann var í eini slíkari støðu sum hesari. Tað verður ongantíð sagt nóg týðuliga og aftur og aftur at cingin sum helst ivi um at eitt tað fyrsta, sum sjálvstýrisflokkurin vildi gjørt, tað var at komi við ejnum nýggjum lógaruppskoti, sum aftur broytti skattahámarkið, sum tað var frammanundan, broyti tollóginar til tað sum tær vóru frammanundan, og í samband við fíggjarlógina vildu vit fari nógv varisligari til verka. Høvdu vit haft meiriluta, so vildu vit eisini avtikið bíðilønina hjá landsstýrismonnum og tingmonnum, og eg vildi eisini avmarka politisku upplýsingina heilt munandi. Í samband við framtíðina var eitt tað fyrsta vit vildu gjørt, tað var at innkalla vinnuna, vinnufeløg til samráðingar um framtíðar viðurskifti føroyinga, og sum fremsta mið og mál vildu vit sett okkum fyri, at arbeiðið skuldi sjálvsagt verða til allar vinnuførar hendur, vit vildu fari hálvt við at viðgjørt skattalóginar av nýggjum, tosa um

skattalækkingar, við tí endamáli at hvør einstakur skattaborgari í hesum landi skuldi havt 75 kr. av hvørjari 100 kr. hann hevði inntøku. Vit vildu framt grundleggjandi broytingar í vinnumynstrunum, ein og hvør føroyingur sum bara hevur lítt eitt lítið sindur á politisku gongdina her á landi seinastu tíðina er samførdum at tað er neyðugt soleiðis sum støðan er í dag, at koma við einum nýggjum politikki, einum borðbarum og rættvísum politikki, sum sjálvsagt setur okkum líka fyri lógini.

Fara vit so inn í fíggjarlógaruppskoti fyri 1990, so siggja vit, ja tað eitt tað fyrsta vit leggja til merkis, tað er at Strandferaskip landsins eru lækkaði niður til 35 mió. kr.. Stovnurin kann ikki við tí uppskotinum sum hann fær halda seg til tað tænastustøði, sum hann hevur gjørt. Avleiðingarnar av hesum eru nú eisini tær, at hópin av sjómonnum í flotanum eru ella hava fingið uppsøgnir. Samgongan greiðir ikki frá hvørjar ætlanir hon hevur tá hon fyrislær at minka upphæddina so munandi, sum annars hevði verið natúrligt, nen ein so stórur niðurskuðrur, sum her er talan um kemur sjálvsagt at føra við sær at tænastustøðið má lækka á virksemi stovnsins, og undanfarnu samgongu , tá høvdu vit til endamáls, stigvíst at lækka landskassans part til stovnin, og tosan varð tá millum 5 og 10% árliga, soleiðis at stovnurin í størri mun, kundi verða førir fyri at klára seg sjálvan. Umfatandi broytíngar vóru tí gjørdar í gongdini við at rationalisera stovnin, endamáli við rationaliseringunum vóru sjálvsagt at fáa kostaðin so lagt niður sum yvirhøvur gjørligt, og høvuðsendamálið aftan fyri hettar arbeiði var at umskipa stovnin til eitt sokalla partafelags líknandi felag, sama var eisini galdandi fyri tyrlutænastuna og bygdarleiðir. Tað vil at feløgini skuldu arbeitt sum eitt og hvørt annað partafelag líknandi felag, og síðani skuldi tænastustøðið verða ásett av politisku mynduleikunum og innan fyri karmarnar skuldi so stovnurin arbeitt.

Vit fara ikki so langt inn í fíggjarlógina, so siggja vit Postverk Føroya, teir siga frá, at teir koma

at hava eitt hall uppá 10 mió. kr. 1990, samgongan avsetur 5 mió. kr., tað vil siga 5 mió. kr. ov lítið, talan er um at lækka tænastustøði munandi ella at siga fólk upp svaranadi til 5 mió. kr. Umseta vit hettar til starvsfólk, ja so hevur samgonga ætlanir um at siga eini 30 starvsfolk hjá Postverk Føroya úr starvi. Sum vant er eingin frágreiðing, so at alt kann sjálvsagt henda, men eg haldi at tit hava skyldu til at greiða stovninum og starvsfólkunum frá hvat tað sum tit ætla.

Ein onnur rættuliga stór konto sum svartiper í øllum hesum spælinum, tað er § 13 landsverkfrøðingurin, og tann kontoin er lækkað við 45 mió. kr., og umseta vit hetta til arbeiðspláss, ja so er talan um eini 300 arbeiðspláss sum verða skorin burtur, og vit mugu viðganga tað, at seinastu árini so hevur verið brúktur nógvur peningur til samferðuendamál, og tá íð samgongan tók við í 1985, tá brúkti landskassin 20,2% av landskasssans útreiðslum til hetta endamál, og vit settu okkum fyri, at lækka hettar tal niður á eitt sera sera rímuligt støði. Í 1986 lækkaði hettar tal niður á 15,6 og í 1987 niður á 13 og 1988 niður 10,6 av samlaðu útreiðslum landskassans. Uppskotið fyri 1990, sum er umlcið 8,6% av landskassans útreiðslum, tað tekur fullkomiliga grundarlagi botnin undan landsverkfrøðingsstovninum, og tveitur í hópatal av fólki út í eitt arbeiðsloysi ið eingin av okkum ynskir uttan júst samgongan við hesum uppskotinum, ið í dag liggur til viðgerðar. Hettar vísir eisini tað álvarsemi, sum samgongumenn og fíggjarmálaráðharrin hava roynt at greitt fólki frá liggur aftanfyri hettar uppskot. Tað hevur ongatíð verið til staðar og tað álvarsemi sum samgongan átti at lagt í sparingar á fíggjarlógini, tær hava verið so sum so, og tað er lætt og tað ómakaleyst at gera sum samgongan hevur gjørt, at spara á ein slíkan hátt, at fólk soleiðis uttan víðari vera tveitt fyri dyr.

Í samband við skúlamálini, har sigur landsskúlafyrisitingin frá, at skal virksemi hjá fólkaskúlanum halda fram, sum tað hevur gjørt bæði 1988 og 89, so skal upphæddin í samband við fólkaskúlan verða 188,6 mió. kr.

Uppskot samgongurnar er uppá 168,5 mió. kr. ella 10 mió. kr. minni, við vanligari útrokning merkir hettar í praksis, at einir 80 lærarar verða tveittir út í arbejðsloysi, og skal skúlin gerast bíligari, ja so er eisini neyðugt at fáa nakrar ófaglærdar, og harvið minka munandi um grundstøði sum fólkaskúlin byggir á. Ein skúli fyri øll er jú høvuðsstemað í almenna fólkaskulatjakinum, men tit ger sjónarmiðini hjá tykkum sjálvum og flokkum tykkara fyri skommum, hin sjálvhjálpni hevur altíð megnað, at liva í samskifti við umhvørvi. Hevur eisini evnað at broytt umhvørvið og harvið egnar umstøður, so við og við, sum vit flyta okkum frá sjálvbjargni til hjálparloysi gerst møguleikin fyri sjálvi at søkja sær ávirkan minni, samstundis sum møguleikin at ávirka egnar umstøður og broyta umhvørvi minkar burt í onki.

Tá ið vit nú vita at vit eru tey sum vit eru, orsakað av teirri ávirkan vit hava fingið, bæði likamliga og sálarliga, ávirkan vit sjálvi hava elvt til í samfelagnum við onnur, hvat skulu vit so hugsa um tær avleiðingar, ið standast av , at til dømis eingin tosar við eitt barn ið einki mál hevur, at røra limirnar á honum sum ikki sjálvur megnar tað, at eingin heldur í hondina á honum ella henni, ið tørvar tað og eingin er at uppliva vakurleikan saman við og harvið geva hóming av hvat vakurleiki er.

Tit hava við uppskotið tykkara avskriva allan framburð innan føroyska fólkaskúlan, Tað ber til at spara, men tað er neyðugt at spara á ratta stað, tað verður sagt klárt og tíðuliga í viðmerkingum frá landsskúlamynduleikunum, at sjálvt um sama upphædd verður játtað, so er hettar í sjálvum sær ein stórur niðurskurður, og tað er júst hettar, sum tit í dag bjóða uppvaksandi ættarliði.

Pauli Ellefsen (sb.)

Harra formaður

Tað er fíggjarlógtingslógin fyri 1990 ella uppskot til hana og løgmansrøðan frá Ólavsøku 1989, sum eru til

viðgerðar undir einum.

Satt at siga, so vónaði eg at vit fingu eitt sakligt og eitt upplýsandi orðaskifti her í tinginum um hesi bæði málini, men tað vónina havi eg uppgivið aftaná at hava hoyrt framsøgumenn andstøðuflokkanna.

Eg vóni tó framvegis at orðadrátturin ikki verður harðligur, sum hann onkutíð hevur verið, men gjarna kontantur.

Til dømis kundi tað verið áhugavert at hoyrt, um floksformennirnir úr andstøðuni, sum eg meira enn tíggju ferðir havi hoyrt sagt og skriva, at teir eisini vilja spara. Um teir í hesum orðaskifti kunnu og vilja lyfta teppi eitt lítið sindur upp frá, og nevna okra upphædd, og onkra konti, sum hesin sparingarvilji fevnir um. Enn hava tey ikki sagt okkum eitt tað einasta orð um hesi viðurskiftir. Hin vegin hava teir við formanni javnaðarfloksins á odda málað hettar samfelagi kolasvart í teirra innleggum. Serliga fiskivinnuna og vinnuna annars, og har vil eg minna á at formaður javnaðarfloksins tey seinstu 18 árini hevur verið løgmaður tey 14. At formaður javnarðarfloksins hevur verið fiskimálaráðharri tey seinastu 4 árini áðrenn hettar vælskeiðið í hvussu so er.

Man hevði sjálvandi haft lindi til í fyrsta umgangi, at givi teimum rætt í at úrslitið av teirra virkscmi øll hesi árini, tað er hettar kolasvarta samfelagið, sum teri sjálvir hava málað upp. Eg haldi tó ikki at tað heilt so vónleyst út, sum tað framgongur av teirra innleggum, og annars vil eg gera vart við at tað hendur í Føroyum í dag, tað hvílur á ti lóggávu, sum bleiv skabt til og við landsstýrinum áðrenn hettar vælskeiðið.

Landsstýrið og samgongan sum sat í vár, hon megnaði av ymiskum orsøkum, hon fann í hvussu so er ikki saman at gera nakra sum helst álvarsligar broytingar her í tinginum, og millum annað tí góvust flokkarnir at arbeiða saman.

Hetta landsstýrið hevur ikki gjørt nakrar skreytir av góðum grundum, tað eru ógvuliga fáar lógir sum eru samtyktar, sum hava broytt hettar samfelagið. Tað vil

siga alt hettar vónloysi, alt hettar skeiva sum fer fram í føroyum í dag, tað hvílur á tí lóggávu, sum var galdandi
áðrenn hettar landsstýrið tók við. Vit kunnu takað eitt undantak, tað er tann bundna uppsparingin, hon er komin í gildi og hon hevur tikið nakað av peningi fra fólki, men hana skal eg koma aftur til.

Sum eg segði so var tað bæði løgmansrøða og fíggjarlógaruppskot sum var til viðgerðar. Um løgmansrøðuna skal eg ikki siga nógv fyri ikki at siga eínki. Tó undrist eg eitt lítið sindur yvir at hon er skrivað og søgd aftaná, at samgonguskjalí millum fólkaflokkin, tjóðveldisflokkin og sambandsflokkin er undirskrivað og ikki áðrenn, men lat tað fara, tað sum hevur áhuga tað er tað sum liggur fyri framman.

Fíggjarlógaruppskoti fyri 1990 er til viðgerðar og tað fevnir um tað nærmastu framtíðina, nevniliga til 31. des. 1990, men tað kemur at hava stóra ávirkan á tað, sum fer at henda fleiri tey komandi árini í hvussu so er hettar vælskeiði út.

Harra formaður.

Eitt mál sum natúrliga hevur hugtikið føroyingin seinastu tíðina er tann bunna uppsparingin, og hettar er bert natúrligt. Tað er eisini natúrligt at spurningurin hevur ørkymlað nógv menniskju sum ikki verða rakt av hesi uppsparing, tá ein hevur í huga ta skriving, sum serliga Sosialurin og javnaðarflokkurin hava vartað upp við. Til dømis havi eg sjálvur av og á, eg havi fingið ógvuliga fáar atfinningar fyri ikki at siga ongar um hesa skipan, men eg havi og á veri kontaktaður tá eg havi verið úti, av ymiskum og sum hava líkasum sagt at hettar gongur jú ikki, vit fáa veldugar byrðar frá tykkum, og eg havi spurt tey hvat tjena tit um mánaðin, og aftaná eina løtu so eru vit blivin samdur, tey vóru slett ikki rakt av hesi bundnu uppsparingini, tey tjena ikki nó mikið til yvirhøvur at verða rakt henni, men svarið til mín er, tað kann ikki passa stendur svart uppá hvitt í sosialinum, og tað hava tey rætt í ,tað stendur í sosialinum, men tað stendur í lógini, at tey ikki skulu betala bundna uppsparíng hesi her somu

fólkini.

129	Avtaka av løgtingslóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlitsnargr.	18/5/90	KFFFF	21/5/90	Arb.málanevnd	25/5/90	25/6/90		3-9, 12-9,	1/6/90		
130	Friskúlalóg	18/5/90	KFFFF	23/5/90	Ment.og skúlan.	25/5/90	25/5/90		6-0	1/6/90		
131	Rættur til orlov í sambandi við barnsburð.	18/5/90	KFFFF	21/5/90	Alm.og heilsun.							
132	Løgtingslóg um maskinskúlaúntøkuvirksemi	25/5/90	FL	25/5/90	Ment.og skúlan.	23/7/90	25/7/90		24-0	3/8/90		
133	Sala av fastogn landsstýrisins í Vág	18/5/90	FL									
134	Løgtingslóg um keyp av fiski frá útlondum til virkingar.	17/7/90	FL	19/7/90	Fiskivinnunevnd	23/7/90	25/7/90 29-0	25/7/90	24-0	31/8/90	112,3/8-90	
135	Løgtingslóg um prísloysti til ráfisk	17/7/90	FL	19/7/90	Fiskivinnunevnd	23/7/90	25/7/90 22-0	25/7/90	19-1,	31/8/90	111,3/8-90	
136	Løgtingslóg um eyka rakstrar- og manningarstuðning	17/7/90	FL	19/7/90	Fiskivinnunevnd	23/7/90	25/7/90 24-0	25/7/90	25-0	31/8/90	110,3/8-90	
137	Løgtingslóg um loysti til fiskavirki	17/7/90	FL	19/7/90	Fiskivinnunevnd	23/7/90	25/7/90 24-0	25/7/90	25-0	31/8/90	109,3/8-90	
138	Løgtingslóg um minstaprís á ráfiski	17/7/90	FL	19/7/90	Fiskivinnunevnd	23/7/90	25/7/90 20-0	25/7/90	19-0	31/8/90	108,3/8-90	
139	Ráfiskaháttið millum fiskavirkini	17/7/90	FL	19/7/90	Fiskivinnunevnd	23/7/90	25/7/90 18-9,	25/7/90	20-3,	31/8/90	107,3/8-90	
140	Løgtingslóg um royndar uppboðssølu av fiski.	17/7/90	FL	19/7/90	Fiskivinnunevnd	23/7/90	25/7/90 27-0	25/7/90	24-0	31/8/90	106,3/8-90	
141	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.	17/7/90	FL	19/7/90	Fiskivinnunevnd	23/7/90	25/7/90 27-0	25/7/90	25-0	31/8/90	105,3/8-90	
142	Avtaka av ymsum løgtingslógum (fiskavraking og síldavraking)	17/7/90	FL	19/7/90	Fiskivinnunevnd	23/7/90	25/7/90 20-0	25/7/90	19-0	31/8/90	104,3/8-90	

FYRISPURNINGAR

				Frá	Fráboðaður	Atkvøðugreiðsla	Atkvøður	Svaraður	Avgreitt	
100-1	Signar Hansen	Reklamu í SVF		M. Petersen	2/8/89	19/9/89	27-0	17/10/89	16/1/90	
100-2	Lagmann	v. ávirkan av avgjaldsog vinningsskattalógi		J.Lindenskov	2/8/89	19/9/89	27-0	21/9/89	22/9/89	
100-3	Jógvan í. Olsen	viðv. gáðk. V&B ikki vera ður flutt		J. við Keldu	2/8/89	19/9/89	27-0	28/9/89	16/1/90	
100-4	Jógvan í. Olsen	vgg. av kvótum fiskiskipum úr Suðuroy		H. Old		19/9/89	27-0	3/10/89	16/1/90	

100-5	Lagmann	Skúlavið. í Vági		N.P. Danielsen	31/8/89	19/9/89	afturkið			
100-6	Jógerð Purkhús	Viðv. siglingarrennu u	Haraldssund	N.P. Danielsen	19/9/89	21/9/89	20-0	26/5/90	1/6/90	
100-7	Jógvan I. Olsen	Viðv. upp	heggingarst uðlinum.	Pauli Ellefsen	16/10/89	26/10/89	28-1	28/3/90	17/4/90	
100-8	Lagmann	m flyt. av	alm.lóggávu til bý-og by	daráðini at umsi	N.P.Danielsen		5/10/89	21-0	18/10/89	16/1/90
100-9	Lagmann	iðv. skúla	gongd í Vági		N.P. Danielsen		26/10/89	26-0	10/11/89	16/1/90
100-10	Ivan Johannesen	ðv. skatta	rælsi til lt	óttarfeløg og	av sams. til ítrót	S.A. Ellefsen		31/10/89	22-0	4/5/90
100-11	Jógerð Purkhús	at steðga	lógliga um	og sølu av r	drekka í Føroyum	J. Lindenskov		31/10/89	22-0	26/5/90
100-12	Jógvan L Olsen	Føroyska	fiskiveiðu á	Flemish Cap		N.P. Danielsen	31/10/89	7/11/89	24-0	24/11/90
100-13	Jógerð Poulsen	Viðv. harðari revsing a		rusevnissmuglarum		S.A.E. og Ó.B	21/11/89	10/11/89	27-0	26/5/90
100-14	Jógerð Poulsen	Viðv. ferðas	amb.millum	Haldórsvík	og Tórshavn	N.P. Danielsen	21/11/89	10/11/89	27-0	25/5/90
100-15	Jógvan I. Olsen	Viðv. hum	maraveiðu			L. Klein	21/11/89	24/11/89	16-0	fallin
100-16	Jógerð Purkhús	Viðv. dálking av firðum v.m.				T. Niclasen	21/11/89	5/12/89	12-0	fallin
100-17	Lagmann	Viðv. undir	gr. sum før	sermál		T. Niclasen	21/11/89	15/12/89	23-0	20/2/90
100-18	Lagmann	ðv. stýris	limum fyri	fyri Føroya	grunnin	N.P.Danielsen	31/1/90	14/2/89	23-0	20/2/90
100-19	Jógerð Purkhús	Viðv. vegn	um til undir	sjóvartunnil		J. Niclasen	7/3/90	7/3/89	19-0	26/5/90
100-20	Lagmann	priv. heim	ild til endur	gjald fyri	kulosusmittaðum	V. Johannsen	9/3/90			
100-21	Lagmann	Viðlíng	landsstýris	manna og lø	tingsm.....	N.P. Danielsen		22/3/89	25-0	28/3/90
100-22	Olaf Olsen	Viðv. yvir	lækna narko	sisj og sjú	trasystra	A. Dam		5/4/09	28-0	18/3/90
100-23	Ivan Johannesen	Viðv. blý	fr. bensini			T. Poulsen	3/4/90			
100-24	Signar Hansen	Viðv. Ment	annargr. Fø	løgt.		T. Poulsen	3/4/90	19/4/90		19/4/90
100-25	Olaf Olsen	Viðv. starv	sfólkatørvi	um í før. he	su og alm.verki	T. Niclasen	3/4/90	24/4/90	28-0	16/5-21/5
100-26	Jógvan I. Olsen	Minkandi	virksemi í	Sandoynni og	Nólsoy og aðrast	T. Niclasen	5/4/90			
100-27	Ivan Johannesen	Viðv. p-tal	inum			J. á Lakjuni	3/4/90	19/4/90		19/4/90
100-28	Jógerð Poulsen					T. Poulsen	3/4/90			
100-29	Olaf Olsen	Viðv. nýggj	ari VHF stað			T. Niclasen	5/4/90			25/6/90

100-30	Jögvan Sundstein	Þróunarfélag Íslands til tekum			T. Niclasen	26/4/90	4/5/90	25-0	25/5/90	1/6/90	

Ólavsøkutingið 1989

Ár 1989, Ólavsøkudag kl. 13.00 varð løgtingið sett. Løgtingsformaðurin frá seinastu tingsetu, Agnar Nielsen, setti tingið sambært skriv dagfest 14. juli 1989.

Tingmenninir eru:

Norðoya valdømi:

Anfinn Kallsberg, Viðareiði, ff.,
Jógvan við Keldu, Klaksvík, ff.,
Vilhelm Johannesen, Klaksvík, jf.,
Heini O. Heinesen, Kunoy, tf.,
Niels Pauli Danielsen, Klaksvik, krf&fff.

Eysturoyar valdømi:

Jógvan I. Olsen, Toftir, sb.,
Edmund Joensen, Oyri, sb.,
Olaf Olsen, Glyvrar, ff.,
Jørgen Thomsen, Skála, jf.,
Lasse Klein, Saltangará, sj.,
Sigmar Hansen, Fuglafirði, tf.,
Tordur J. Niclasen, Eiði, krf. & fff.

Norðstreymoyar valdømi:

Agnar Nielsen, Vestmanna, sb.,
Jógvan Durhuus, Vestmanna, tf.

Suðurstreymoyar valdømi:

Jógvan Sundstein, Tórshavn, ff.,
Óli Breckmann, Tórshavn, ff.,
Poul Michelsen, Tórshavn, ff.,
Pauli Ellefsen, Hoydølum, sb.,
Eilif Samuelsen, Tórshavn, sb.,
Marita Petersen, Tórshavn, jf.,
Jákup Lindenskov, Tórshavn, jf.,

Tórbjørn Poulsen, Tórshavn, sj.,
Karin Kjølbro, Argir, tf.,
Finnbogi Ísakson, Tórshavn, tf.,

Vága valdømi:
Svend Aage Ellefsen, Sandavági, ff.,
Sune Jacobsen, Sørvági, sb.

Sandoyar valdømi:
John Petersen, Skopun, ff.,
Jógvan Adolf Johannessen, Skopun, jf.

Suðuroyar valdømi:
Flemming Mikkelsen, Vági, sb.,
Atli P. Dam, Tórshavn, jf.,
Henrik Old, Vági, jf.,
Hergeir Nielsen, Vági, tf.

Fyribils formaðurin bað Henrik Old og Jógvan við Keldu um at virka sum ávíkavist 1. og 2. tingskrivari.

Síðani varð formansskapur valdur. Til tingformann varð valdur Agnar Nielsen, 1. næstformaður: Jákup Lindenskov, 2. næstformaður: Poul Michelsen og 3. Næstformaður: Hergeir Nielsen.

Sum 1. tingskrivari varð Karin Kjølbro vald og sum 2. tingskrivari varð Henrik Old valdur.

Formaðurin gav síðani Jógvan Sundstein, løgmanni, orðið til løgmansrøðuna á Ólavsøku 1989.

Í skrivi dagfest 31. juli 1989 frá Tordi J. Niclasen biður hann um at verða loystur úr starvi sum landsstýrismaður. Hetta varð samtykt við 22-0 atkvøðum.

Í skrivi dagfest 2. august 1989 biður Jógvan Sundstein, løgmaður, um farloyvi, meðan hann røkir starvi sum løgmaður. Við 22-0 atkvøðum varð samtykt, at Eliesar Arge tekur sætið á tingi fyri hann.

Í skrivi dagfest 30.august 1989 biðja landsstýrismennirnir Jógvan I. Olsen og Signar Hansen um farloyvi, meðan teir eru lands-

stýrismenn. Við 27-0 atkvøðum varð samtykt, at Jákup Lamhauge og Petur Reinert taka sætið á tingi fyri teir.

Í skrivi dagfest 31. august 1989 biður Olaf Olsen, landsstýrismaður, um farloyvi, meðan hann er landsstýrismaður. Við 30-0 atkvøðum varð samtykt, at Jógvan á Lækjuni tekur sætið á tingi fyri hann.

Løgmansrøðan 1989

1. Politiska gongdin

Valið 8. november í fjør førdi við sær, at táverandi samgonga misti sín meiriluta á tingi.

Drúgvar samráðingar í fleiri umførum endaðu við, at ein samgonga millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin, Sjálvsstýrisflokkin og Kristiliga Fólkaflokkin varð skipað hin 18. januar í ár.

Semja var millum hesar flokkar um, at høvuðstrupulleikin í føroyska búskapinum er tann manglandi javnvágin, sum hevur havt vaksandi uttanlandsskuld við sær.

Tíverri vísti tað seg, tá táverandi landsstýrið legði fyri tingið lógaruppskot um ábøtur fyri búskapin og fiskivinnuna, at samgongan ikki hevði meiriluta aftan fyri seg. Hin 29. mai segði Sjálvsstýrisflokkurin samarbeiðið upp og seinri fullu landsstýrisuppskotini á tingi.

Síðani varð farið undir samgongutingingar av nýggjum og hin 22. juni, t.v.s. fyri stívliga einum mánaði síðani, varð núverandi samgonga millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin skipað.

Nýggja samgongan ásannar, at fíggjarliga gongdin og støðan í samfelagnum krevur, at framd verða nógv ymisk og heilt serlig tiltøk, skal tað eydnast at venda búskaparligu gongdini rætta vegin.

Eisini fer samgongan at royna, fyrst og fremst við bygnaðarbroytingum, at rætta verandi skeivleikar í fiskivinnuni og gera okkara høvuðsvinnu virknari. Í ár verða veittar fiskivinnuni størri afturberingar enn undanfarin ár.

2. Búskaparliga gongdin

Eitt er at ivast í, at størsti skelkurin av búskaparliga støðu samfelagsins var, at uttanlandsskuldin við árslok 1988 varð uppgjørd til 6,7 mia. kr. og ikki 4,6 mia. kr. sum mett av fyrstan tíð. Við tað, at ein kanning av tølunum við árslok 1984 vísir, at almennu tølini tá vóru nøkulunda rætt, er henda nýggja uppgerðin somuleiðis ein ásannan av, at gjaldsjavnahallið 1985-88 hevur verið væl størri enn higartil uppgjørt.

Við hesi gongdini hava marknaðarprísirnir fyri útflutningsvørur okkara samstundis verið sera lágir, og høvuðsvinnan hevur verið fyri stórum bakkastum, bæði sum heild og á serligum økjum. Nøkur av teim nýggju og góðu skipum, sum komu seinastu árini, eru longu farin á heysin og summi av teimum av aftur landinum.

Landskassans útreiðslur hava verið vaksandi og inntøkurnar øktust somuleiðis. Í 1988 vóru inntøkur landskassans umleið 180 mió. kr. hægri enn mett; men harumframt var meirnýtslan á ymiskum útreiðslukonti umleið tað sama, soleiðis at eingi avlop verður á roknskapinum.

Veðhaldsútlegg landskassans eru nógv økt. Í 1988 og higartil í 1989 hava tey verið 408 mió. kr. og harafturat koma nógvar milliónir í hesum árinum, uppnæddir, sum enn ikki eru endaliga uppgjørdar. Í 1988 og 1989 eru tilsamans avsettar 155 mió. kr. fyri effektivar veðhaldsbindingar.

Sum áður nevnt eru fleiri nýggj og góð skip farin av knáranum og fleiri onnur eru um at fara. Tað landsstýrið, sum tók við í januar í ár mátti beinanvegin ásanna, at fleiri fyritøkur, bæði á sjógvi og landi, stóðu til at falla, og í summum førum var bert hildið lív í teimum við serligari hjálp. Tí var tað neyðugt, at nakrar fyritøkur fóru í likvidatión. Summar av hesum eru tíbetur byrjaðar aftur á einum sunnum grundarlagi.

3. Nøkur búskapar- og fíggjartøl

Í fylgiskjølunum til løgmansrøðuna eru sum vanligt uppgerðir yvir búskapargongdina og verður víst til tær. Tó skal verða viðmerkt, at uppgerðin yvir gjaldsjavna, uppsparing, bruttotjóðarúrtøku v.m. ikki enn kunnu verða uppgjørd nágreiniliga, av tí at munurin millum verandi uttanlandsskuld og tað áður uppgjørdu verður at rokna inn í hesa uppgerð.

Ein nágreinilig uppgerð yvir uttanlandsskuldina við ársbyrjan 1987, uppgjørd til 5792 mió. kr. móti áður 3875 mió. kr., við ymiskum sundurgreiningum er tøk.

Handilsjavnin fyri 1988 vísir eitt hall uppá 1170 mió. kr., skip íroknað og 790 mió. kr. skip frátøld. Í báðum førum er hetta met. Handilsjavnin fyrra hálvárið 1989 sýnir bert eitt lítið hall; men serliga innflutningstølini eru óviss.

Helst fer handilsjavnahallið í 1989 at verða væl minni enn undanfarin ár. Hetta kemur av trimum høvuðsorsøkum nevniliga, at færri skip verða innflutt, minni vanligur innflutningur og eitt sindur hægri útflutningsvirði.

Gjaldsjavnahallið í 1989 verður helst eisini væl minni enn undanfarin ár; men kortini verður eitt hall, og tað vil siga, at samlaða uttanlandsskuldin økist, hóast við ikki so stórari ferð sum áður. Málið hjá landsstýrinum er at minka um vøksturin á uttanlandsskuldini í 1989 og at fáa eitt gjaldsjavnayvirskot í 1990, soleiðis at sjálv skuldin minkar, sjálvt um tað verður við smærri upphæddum at byrja við.

Gjaldføri landskassans versnaði nógv seinasta ár og er í løtuni tepurt. Nakrar av útreiðslum landskassans 1989 verða hægri enn mett á fíggjarlógini, serliga snýr tað seg um veðhaldsútlegg, og tollinntøkurnar (áðrenn hækkingarnar) verða helst minni enn mett, kanska eini 100 mill. Samanumtikið er væntandi, at roknskapurin hjá landskassanum fyri 1989 fer at vísa eitt hall uppá 200-250 mió. kr. Harumframt stavar gjaldførishalli í 1988 uppá kr. 332 mió. kr.

Nýggja landsstýrið hevur fyri komandi ár ætlanir um eina fíggjarlóg fyri 1990 og 1991 við sparingum og øðrum tiltøkum fyri at fáa yvirskot, soleiðis at hallið er afturvunnið í 1991.

4. Búskaparlig tiltøk

Høvuðsfortreytin fyri, at búskaparlig tiltøk kunnu hjálpa og bøta um støðuna, er, at vinnumøguleikarnir batnað og geva samfelagnum sum heild eina framleiðsluinntøku.

Vinnulívspolitikkur er ikki at troðka framat landskassanum, og hann skal ikki hava hol í botni ella lok, sum lættliga fýkur av. Landskassin hevur sínar inntøkur frá tí framleiðandi vinnuni - í rúmastu merking - og verður at húsast skilagott við hesum fæi til neyðugu endamálini hjá tí almenna at umsita.

Við tí ovur stóra virksemi - bæði almennum og privatum - sum verið hevur, eru skerjingar tí neyðugar.

Landsstýrið hevur lagt fram uppskot og fingið samtykt lóggávu um tvungna bundna samansparing og hækkingar í innflutningsgjøldum v.m. Hesin peningur fer í fyrstu syftu til at endurreisa fiskivinnuna; men skal sum frá líður fara til at økja um samfelagsligu samansparingina, til at vinna landskassans fyribils hallið aftur og bøta um gjaldføri.

Sum frá líður mugu tær byrðar, fíggjarlógin leggur á samfelagsborgararnar, lættast aftur. Tí hevur landsstýrið sett sær fyri at spara týðandi upphæddir á komandi fíggjarlógum og sæst hetta longu á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1990, sum verður lagt fyri tingið um ein mánaða.

Fyri at forða fyri hækkingum í kostnaðarstøðinum verður eisini framlagt uppskot um at avtaka prístalsviðgerðina av lønum v.m.

Skerjingar í almennum íløgum verða eisini stórar. Samgongan hevur sett sær fyri, at hesar ikki fara upp um 550 mió. kr. árliga komandi trý árini. Her er talan um íløgur hjá bæði landinum, kommunum og almennum stovnum (SEV, Telefonverkinum v.m.)

Privatu íløgurnar fara eisini at minka og eru longu minkaðar. Lánsmøguleikarnir eru ikki so rúmir longur, og landsstýrið fer at vera varið við lánsloyvum, uttan tó at steðga øllum virksemi.

Umrøðan seinri í røðuni av teim ymisku málsøkjunum fer at vera merkt av teim ætlaðu sparingunum; men samstundis má dentur verða lagdur á, at hetta er neyðugt, fyri at samfelagið aftur kann mennast á einum sunnum grundarlagi.

5. Fiskivinnumál

Skipaflotin

Fleiri tiltøk eru sett í verk og fleiri fara at vera sett í verk fyri at bøta um støðuna hjá báta- og skipaflotanum. Í fyrstu syftu eru útvegir funnir til at veita verandi flota í minsta lagi somu avreiðingarprísir.

Framyvir verður tó neyðugt at fáa ein fiskiflota, sum ber seg, uttan munandi almennar afturberingar, so at tann peningur, sum settur verður á fíggjarlógina til fiskivinnuna, meira verður nýttur til at finna nýggjar leiðir og at seta gongd á óroynd øki og leiðir.

Tiltøk at náa hesi mál eru fleiri. Studningsskipanin verður at endurskipa og gjøld og annað, sum tyngir fiskivinnuna, verða at broyta. Til at fáa talið á fiskiførum niður á eitt støði, soleiðis at fiskastovnarnir kunnu koma fyri seg aftur og fiskiførini fáa møguleikar at royna, verða býtið og skipanin millum veiðihættirnar at leggja væl til rættis og í góðari tíð. Uppnøggingarstuðulin skal fáast at virka, so verulig veiðiorka verður keypt skjótt úr flotanum.

Við praktiskum fiskiroyndum verður roynt at útvega øktar møguleikar hjá verandi flota, og innflutningsloyvi til fiskiskip ella nýbygging verða bert loyvd, um vísast kann á, at pláss er fyri øking í veiðiorkuni í ávísari veiði.

Kannað verður, um tað almenna í størri mun skal lata eftirlitið við dygd og øðrum fyribrigdum í fiskivinnuni frá sær, sum vinnan náttúruliga loysir sjálv. Fyri at fáa avreiðingarprísin tættari knýttan at marknaðarprísum - og hækkandi marknaðarprísum - verða royndir gjørdar við uppboðssølu, og samstarvið millum almennar myndugleikar og privata fiskasøluvirksemi verður tryggjað. Harumframt verður afturberingin úr landskassanum til skip og manning endurskoðað og broytingar gjørdar í skipanini hjá ráfiskagrunninum og studningsnevndini.

Sambært løgtingslóg um, at Vaktar- og Bjargingartænastan yvirtekur ábyrgdina av fiskivinnueftirlitinum og bjarging á føroyskum sjóøki samtykti Føroya Løgting, at samstarvið millum Vaktar- og Bjargingartænastu landsins og Færøernes Kommando varð skipað. Arbeiðið at skipa samstarvið er byrjað, og ein nevnd at avgreiða hetta mál fer til verka eftir ólavsøku.

Føroya Landsstýri fer at halda fram við at stuðla arbeiðinum at kanna grindastovnin og verja aldargamla føroyska grindaraksturin.

Veiðimøguleikar hjá føroyskum fiskiførum uttan fyri føroyska landgrunnin í 1989

Fiskivinnusamráðingarnar um fiskikvotur føroyinga uttan fyri føroysku landleiðina fyri 1989 gjørdust sera truplar. Vegna ringa støðu í týdningarmiklum stovnum bøvdu fleiri av teimum londum, vit hava fiskivinnusáttmálar við, ikki møguleikar at varðveita støðið í sáttmálanum. Tey vildu ikki góðtaka føroyska sjónarmiðið, at ikki er neyðugt at skerja sáttmálastøðið eins nógv og heildarkvotan verður skerd.

Seriga í Barentshavinum var støðan sera trupul og støðan gjørdist ikki mætari, tá Noreg og Sovjettsamveldið læstu møguleikarnar fastar at geva sømdir hvør hjá øðrum.

Av hesum komu bæði sáttmálarnir við Noreg og Sovjettsamveldið seint og væl undir støðinum í 1988, tá hugsað verður um veiðimøguleikarnar hjá saltfiska- og verksmiðjutrolarunum. Av somu orsøk vóru ikki møguleikar at lata feskfiskatrolararnar fáa kvotu eystanfyri í 1989. Veiðimøguleikarnir sunnan fyri 62 stig vóru í høvuðsheitum óbroyttir.

Í sáttmálanum við felagsmarknaðin vórðu makrel- og rossamakrelkvoturnar niðurskornar eitt sindur; men møguleikarnir at veiða makrelin vórðu bøttir. Við hesum samráðingum varð góðkent, at Føroyar eiga fastan part í vestanmakrelinum.

Skipini, sum veiða til fiskaðarfisk, fingu eins møguleikar í 1989 og í 1988.

Hin týdningarmikli møguleikin hjá nótaskipunum at veiða lodnu millum Eysturgrønland, Ísland og Jan Mayen kom í nýggja legu í 1989. Grønland, Ísland og Noreg hava nú gjørt sáttmála um henda stovn, og tað merkir, at lodnan ikki longur er orsøk til ósemju við Ísland og at nú eisini slepst í íslendskan sjógv at fiska tann partin av lodnukvotuni, sum føroysk skip keypa úr Grønlandi. Óvist er enn, hvussu stóran part av grønlendsku kvotuni føroyingar hava møguleika fyri at keypa.

Føroyska kvotan av botnfiski undir Íslandi var óbroytt í 1989, nóast toskurin varð skorin 10% niður hjá íslendskum skipum.

Í Eysturssjónum minkaði kvotan í DDR-sjógvi; men var óbroytt í sovjetskum sjógvi.

Kanada gav føroyskum svartkalvabátum eins møguleikar og í 1988. Kanadisku myndugleikarnir hava samstundis lovað, at teir skulu láta føroysk skip fáa større part sunnan fyri 61 stig, um nakar møguleiki er fyri tí.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at kanna allar møguleikar fyri veiði hjá føroyskum skipum uttan fyri landgrunnin. Fyribilssamráðingar við Grønland vóru fyrr í ár; men endaligar samráðingar hava bíðað eftir, at samráðingarnar millum Felagsmarknaðin og Grønland endaðu. Samband er við grønlendsku myndugleikarnar um Nordafar.

Sáttmálin við USA er endurnýggjaður fyri at halda allar møguleikar - serliga í Alaska - opnar.

Annars hevur landsstýrið stuðlað royndum at finna veiðimøguleikar aðrastaðni.

Sjóvinna

Nýggja sjóvinnulógin, manningarlógin og mynstringarlógin eru komnar í gildi. Sostatt restar bert í at seta sjómannalógina í gildi av tí stóra lógarverkið, sum gjørt varð í 1985 og 1986 fyri at fáa lóggávuna um sjóvinnu í Føroyum á hædd við altjóða krøv.

Arbeitt verður við at fáa øktu umsitingarkrøvini av hesum lógum løgd til rættis.

6. Alivinna

Alivinnan er vorðin tann vinnugreinin, sum eftir fiskivinnuni og fiskiíðnaðinum hevur størsta útflutning í virði. Parturin hjá alivinnuni av samlaða útflutningsvirði Føroya var í 1985 5%, og í 1988 var hann økstur til 11%. Her er laksaveiðin tó íroknað. Hetta sær út til at kunna gerast størsta alternativ til okkara høvuðsvinnu, hóast stórir trupulleikar eru í hesi vinnugrein við. Søluprísirnir eru sum kunnugt nógv lækkaðir, og óvist er, nær teir koma uppaftur, so rakstrarligu fortreytirnar koma óivað framvegis at vera harðar.

Tað eru nógv alilóyvi givin, og ein hópur av umsóknum um aling av ymiskum slag er í landsstýrinum. Útbygging av alivinnuni má fara fram bæði við varsemi og skynsemi. Landsstýrið fer at gera sær ómak og fara fram soleiðis, at vinnan í mest møguligan mun sjálv hevur ábyrgdina av rakstrinum, tó undir nágreiniligum fortreytum. Tann hjálp, sum koma kann upp á tal, verður fyrst og fremst at finna útvegir til fígging; men ikki beinleiðis studning. Tó vil landsstýrið vera við til at fíggja eina fiskarøktartænastu á privatum grundarlag, um alararnir vilja bera ein eins stóran part av henni.

Virkað verður fyri at endurskoða loyvisskipanirnar fyri aling, soleiðis at smoltframleiðslan kann vaksa, tað hon kann, undir fíggjarligu ábyrgd einstaka smoltalarans. Har tað ikki er til bága fyri umhvørvið, verða loyvini økt til fíggjarliga meiri lønandi eindir. Støddin á loyvinum verður ásett soleiðis, at til ber at hava eftirlit við, hvussu loyvið verður nýtt. Loyvistíðin verður samstundis longd.

Landsstýrið hevur samtykt at seta útbyggingina hjá p/f Fiskaaling ógvuliga høgt í fíggjarligu raðfestingini. Henda útbygging fer at tryggja, at útvegast kann góður lívfiskur, skikkaður til føroysk viðurskifti og at ánaldandi kynsbótararbeiði kann fara fram. Eisini fer hetta at gera tað møguligt at finna gott fóður úr fiski landaðum í Føroyum.

Støðin við Áir fær samstundis møguleikar fyri at vera tænastustovnur hjá allari alivinnuni, soleiðis at alarar hava eitt stað at venda sær við øllum spurningum um trivnaðin hjá alifiskinum.

Vinnan hevur fyri ein part sjálv loyst tørvin á beinleiðis fiskasjúkutænastu og umhugsað verður í løtuni, um besta loysnin fyri alararnar fæst við stuðuli landsstýrisins í hesum royndum.

Virkað verður annars fyri at útvega neyðuga fígging, og at fíggjarliga ráðgevingin til alararnar verður stuðlað.

Umsitingin hjá alirátnum er flutt til Landsskrivstovuna, beinleiðis undir landsstýrismanninum í alimálum. Alirátið verður endurskipað sum eitt ráð mest umboðandi alivinnuna og skal hava eitt orð at siga, tá uppskot eru frammi um tiltøk, sum ávirkan hava á alivinnuna.

7. Íðnaður

Fiskavirki

Flakavirkini høvdu eitt sera vánaligt úrslit í fjør, og tað verður neyvan nakað betri í ár heldur, so her má tað almenna hjálpa til, um tað er møguligt. Hugsað hevur fyrst og fremst verið um umfígging til bíligari lán. Kann tað gerast, fer tað at lætta munandi um raksturin.

Umhugsað verður eisini at býta råvøru millum virkini. Hetta er torført, tá ov lítið er til av råvøru til øll virkini, og tí verður einki virki væl fyri á henda hátt. Tískil verður eisini arbeitt við at útvega råvøru uttaneftir, t.d. rundfrystan fisk. Um hetta kann gerast fyri ein rímuligan prís, er råvøruspurningurin loystur.

Tað eru eisini tey framkomnu londini, sum keypa sær råvøru til viðari virkingar. Um vit tí vilja taljast millum hesi, eiga vit at hava ein framleiðsluútbúnað - bæði fólk og tól - sum er førur fyri hesum. Virki eru, sum arbeiða á henda hátt, og vónandi kann verða økt um hetta eins og marknaðarviðurskifti vónandi ikki fara at hindra hesum.

Størsti trupulleikin hjá fiskavirkjunum í 1988/89 var, at prísirnir fullu og avreiðingarnar minkaðu. Hetta førir so við sær, at hvørt virkið fær ov lítla råvøru til ta framleiðslu, tey leggja seg eftir. Virkini mugu fáa meiri burturúr einum minkandi tonsatali.

Landsstýrið ætlar at virka fyri, at føroysk fiskavirki ganga nýggjar leiðir at bøta og betra um dygdina, samstarv um arbeiðsbýti, serframleiðslu og sølu.

Nýggja matvørulógin og avgerðirnar um, at hitt almenna letur meira upp í hendurnar á vinnuni fyri at sambandið millum prís, dygd og ábyrgd fyri endaligu dygdini á vørum til keyparar uttanlands verður tryggjað, fara at gera reglurnar um alment eftirlit einfaldari og minka um pappírsgongdina á fiskavirkjum og útflutninginum av fiskavørum.

8. Landbúnaður

Í stuðningsskipanini og í arbeiðinum hjá Royndarstøðini verður dentur lagdur á, at farið verður undir at gera mjólkarúrdráttir og aðrar landbúnaðarúrdráttir við støði í føroyskum fóðri.

Umhugsað verður at samskipa almennu og hálvalmennu tænasturnar innan landbúnaðin.

Nýggj jarðarlóg varð samtykt í fjør, og hon varð lýst í gildi í juni í ár. Eftir eru nakrar kunngerðir og reglugerðir, sum arbeitt verður við.

9. Skatta- og tollmál

Lógin um rentuskatt virkar yvirhøvur væl; men kortini er ein ávísur vandi fyri misbrúki á hesum øki. Landsstýrið arbeiðir tí við broytingum í hesi lóggávu, broytingum, sum forða fyri rentuspekulatión, men kortini stimbra samansparingarhugan.

Landsstýrið arbeiðir eisini við broytingum í reglunum fyri skatt hjá fólkapensjónistum.

Tolllógin verður endurskoðað, serliga tí ein nýggj handilsavtala vónandi fæst við EF. Ætlanin er eisini at taka burtur øll dýrkandi almenn gjøld, sum nú liggja á fiskivinnuni.

10. Skúlamál

Landsstýrið arbeiðir við at broyta undirvísingina fyri tey 16 - 19 ára gomlu.

Fiskivinnuskúlin byrjar at undirvísa í Vestmanna eftir summarfrítíðina. Áhugin fyri fiskivinnuútbúgving er stórur, og landsstýrið hevur tikið ta avgerð, at byrjað verður við tveimum flokkum við umleið 40 næmingum tilsamans.

Landsstýrissamgongan hevur tikið ta støðu, at HF- og Studentaskúlin í Eysturoy verður sambygdur við handilsskúlan á Kambsdali. Við slíkari samanlegging fáast undirvísingarligir fyrimunir, samstundis sum raksturin og sjálv byggingin gerst munandi bíligari, enn um skúlin varð bygdur fyri seg sjálvan. Málið verður lagt fyri tingið í hesi tingsetu. Byggingin byrjar í 1991.

Neyðugt verður at fara undir sjóvinnuútbúgving. Landsstýrið hevur tikið ta avgerð, at byrjað verður í leigaðum hølum. Landsstýrið kannar eftir, hvørjir møguleikar eru, og ætlanin er at taka avgerð um hetta innan stutta tíð.

Arbeiðið at fyrireika, at maskinskúli verður bygdur, er farið í gongd; men sjálv byggingin byrjar ikki fyrrenn í 1991.

Fólkaskúlalógin, ið hevur verið í gildi síðani 1979, verður endurskoðað.

Landsstýrið er farið undir at skipa so fyri, at Serskúlin á Tróni verður lagdur undir skúlaverkið, soleiðis at hann framyvir virkar sum ein tænastustovnur hjá fólkaskúlanum.

Seinastu árini er rættilig gongd komin á skúlabókaútgávuna. Hesin vøkstur stendst fyrst og fremst av tí meirjáttan, Løgtingið veitti Skúlabókagrunninum, ið stendur fyri bókaútgávuni. Landsstýrið fer at halda fram við hesum, soleiðis at málið, at allar bøkur í skúlanum verða á føroyskum, verður nátt.

Landsmiðstøðin, ið higartil hevur starvast í fyribils hølum, flytir inn í nýggj tíðarhóskandi høli 1. september í ár. Landsstýrið ætlar, at Skúlabókagrunnurin og Bókamiðsølan skulu liggja undir somu lon sum Landsmiðstøðin fyri undirvísingarambo.

Landsstýrið er farið undir at endurskoða lærlingalógina.

11. Mentunarmál

Eftir at nýggj reglugerð varð samtykt fyri Løgtingsins Mentunargrun, eru stór framstig hend á mentunarøkinum. Teimum, ið skriva bøkur ella fáast við list, hevur verið veittur munandi hægri stuðul enn árini frammanundan. Úrslitið er, at talið á føroyskum bókum er vaksið nógv tey seinnu árini.

Umstøður Sjónvarps Føroya at starvast undir hava verið alt annað enn góðar. Málið eigur at vera, at nýtt og tíðarhóskandi sjónvarpshús verður bygt, og at peningur verður avsettur á komandi fíggjarlógir, soleiðis at farið verður undir bygging um ikki ov langa tíð.

Sítandi landsstýrið hevur tó avgjørt, at nýtt sjónvarpshús verður ikki bygt í hesum valskeiði; men tekur undir við, at nøli nærhendis sjónvarpinum, ið eru til sølu, verða keypt til sjónvarpið fyri at bøta um arbeiðsviðurskifti sjónvarpsins til farið verður undir at byggja nýggja húsið.

Nýggi 200 kw millumbylgjusendarin til Útvarp Føroya verður royndarkoyrdur í januar/februar næsta ár, og kann væntandi verða tikin í nýtslu í mars mánaði.

Á Løgtingsins fíggjarlóg er peningur avsettur til Leikpall Føroya. Landsstýrið hevur samtykt reglugerð fyri leikpallin; men er málið enn ikki avgreitt í fíggjarnevnd Løgtingsins. Við hesum tiltaki verða stór framstig gjørd fyri føroyskan sjónleik - bæði í bygd og býi.

12. Orkumál

Orkuráðið stendur fyri ymiskum arbeiði og kanningum viðvíkjandi orkumálum. Ymiskt av tí tilfari, sum ráðið hevur arbeitt við, er til viðgerðar í landsstýrinum. Virkað verður fyri, at játtanirnar til orkugrunnin verða til mest gagn samfelagsbúskaparliga sæð. Landsstýrið hevur stuðlað royndunum at nýta hita frá elverkunum og spilloiju við lánum úr orkugrunninum.

13. Ferðamannavinna

Áhugin hjá fremmandafólki at vitja Føroyar tykist at vaksa. Seinastu árini hava landsstýri og løgting tikið stig til at

bøta um viðurskiftini í landinum at taka ímóti ferðafólki. Hóast bata, so eru vit ikki enn komin á mál; men mugu framhaldandi arbeiða fyri at skapa uppaftur betri umstøður fyri fremmandafólki, ið leitar higar til lands. Landsstýrið er farið undir at endurskoða tær lógir, ið hava við ferðamannavinnu at gera, og ætlar at leggja broytingaruppskot til galdandi lógir fram í hesi tingsetu.

14. Almannamál

Landsstýrið fer í næstu framtíð at seta nevnd at endurskoða alla føroysku almannalóggávuna.

Skipanin um barnastyrk verður broytt, soleiðis at hon bert fevnir um børn undir skúlaaldur.

Reglugerð um mannagongdina hjá Almannastovuni undir málsviðgerðini av veitingum er um at vera liðug. Serliga á forsorgarøkinum er hetta neyðugt og gott tiltak, sum bæði lættir um arbeiði og ger málsviðgerðina tryggari.

Røktarheimsbyggingin í Sandoynni heldur fram. Aðrar framtíðar røktarheimsbyggingar verða endurskoðaðar fyri ikki at fáa ov stórar stovnar; men heldur at fáa smærri heim á staðnum og at økt verður um vardu íbúðirnar. Hóast sparingar og raðfestingar verður í ein vissan mun eisini pláss fyri fleiri heimum til Andveikraverndina og líknandi serstovnar.

15. Heilsumál

Undir verandi umstøðum verður útbygging av sjúkranúsunum tálmað og útsett.

Kortini verður arbeitt við at betra um heilsutænastuna og verður primera heilsutænastan støðugt útbygd og samskipað.

Eisini verður arbeitt víðari við m.a. hesum málum:

1. Uppgávubýtinum millum sjúkrahúsini.

2. Eini styrktari fakligari og umsitingarligari leiðslu fyri heilsuverkinum sum heild.

3. Ambulatoriuvirksemi - at innleggingarnar verða styttri og færri, soleiðis at seingjartørvurin minkar.

Vandin fyri vaksandi narkotikamisnýtslu er stórur, og landsstýrið er sinnað at gera alt, ið gerast kann, fyri at fyribyrgja, at narkotika kemur til landið.

16. Arbeiðara-, lønar- og prísmál

Í hesi tingsetu fer landsstýrið at leggja fram uppskot um at avtaka lóggávuna um at prístalsviðgera lønir v.m.

Eisini verður lóg løgd fram um vinningsteðg.

Lønarsamráðingarnar í vár og í summar eru avgreiddar í friði og náðum og (burtursæð frá prentsmiðjuøkinum) uttan verkfall. Lønarhækkingarnar millum 6% og 7% í komandi 2 ára skeiði eru í meira lagi, tá ið føroyska kappingarførið verður havt í huga; men friður á arbeiðsmarknaðinum hevur eisini stóran týdning.

Seinri í hesi tingsetuni kemur landsstýrið við lógaruppskoti um føroyskan arbeiðsrætt.

Tær neyðugu sparingar og skerjingar, sum verða gjørdar í komandi tíð fara at ávirka arbeiðsmøguleikarnar í samfelagnum. Arbeiðið fer at vera væl minni.

Frá landsstýrisins síðu verður roynt at skipa soleiðis fyri, at støðan við vantandi arbeiðsmegi ikki verður broytt til beinleiðis arbeiðsloysi.

17. Kommunumál

Danska stjórnin hevur ásett, at lán til føroyskar kommunur úr Kommunekredit við ríkisveðhaldi samanlagt ikki mugu vera meira enn 300 mill. kr. Hendan upphædd verður síðani at skerja í sama mun sum avdráttir verða goldnir og restskuldirnar minka.

Tað vil við øðrum orðum siga, at í veruleikanum verður lógin frá 1955 um ríkisveðhald til føroyskar kommunur fyri Kommunukreditlánum avtikin.

Hetta kemur í fyrsta umfari føroysku kommununum illa við; men tá so er, mugu aðrar fíggingarloysnir finnast.

18. Umhvørvismál

Fyri tveimum árum síðani samtykti Løgtingið umhvørvislóg, ið áleggur okkum stórar uppgávur, sum neyðugar eru at loysa. Landsstýrið arbeiðir við nýggjum reglugerðum, ið verða at seta í gildi. Lógin um at beina burtur bilvrak er sett í gildi. Reglugerðin er um at verða liðug og verður lýst fyrsta dagin. Málið um spilloljuvirki hevur landsstýrið avgreitt og farið verður undir byggingina rættiliga skjótt.

Samgongan setti sær m.a. fyri at fylgja væl við í tí, ið hendir á havumhvørvisøkinum uttan fyri Føroyar. Í hesum viðfangi skal verða nevnt, at landsstýrið hevur mótmælt tí ætlan, ið hevur verið frammi í Bretlandi um at goyma kjarnorkuburturkast undir havbotninum.

19. Samferðslumál

Á samferðsluøkinum eru eins og undanfarnu ár ynskini størri enn tann peningur, ið játtaður verður á fíggjarlógini.

Hendan samgongan hevur sett sær fyri at skerja virksemi hjá Landsverkfrøðingum nakað, eins og játtanirnar til Strandferðsluna og Bygdaleiðir verða skerdar.

Avbjóðingin verður tí at samferðsluøkinum sum heild at fáa mest burturúr teimum minnu játtanunum uttan at lækka tænastustøðið munandi.

Eins nógv arbeiði og undanfarnu ár verður ikki sett í gongd. Vegir, ið verða lagdir, og bergholsarbeiði, ið eru í gongd, verða tálmað.

Vanligi rakstrinum eigur at gerast meira rationellur.

Nógv blaðskriving og nógvar gitingar um framtíðina hjá Atlantic Airways have staðist av tí, sum í samgonguskjalinum stendur um at lata privatar fáa lut í felagnum.

Ætlanin er - um tað vísir seg at vera tað besta - at lata almenningin seta pening í felagið. Tó skal tað verða sagt heilt greitt, so at eingin misskiljing stendst av tí, at landsstýrið ikki hevur í hyggju at lata føroysku flogferðsluna aftur á útlendskar hendur. Føroyska felagið er komið fyri at verða verandi.

Telefonverkið tók í vár nýggju N.M.T. skipanina í nýtslu. Í ár verða m.a. hesar verkætlanir framdar:

- Nýggjar radiomastrar á Stólafjalli, Runavík í Eysturoynni og í Miðvági

- Nýggjar og víðkaðar digitalar sendiskipanir til Suðuroynna, Vágoynna og Eysturoynna.

20. Undirgrundin

Samráðingar við donsku stjórnina um undirgrundina fara at halda fram.

Við tí tilfari, sum útvegað er, og við samráðingunum í august 1988 sum grundarlagi verður arbeitt víðari við málinum.

Danska stjórnin hevur sent landsstýrinum uppskot um kommissorium hjá tilætlaðu arbeiðsnevndini. Landsstýrið og samgongan fara heilt skjótt at viðgera hetta upupskot, so nevndin kann verða sett og fara til arbeiðis.

21. Samráðingar við EF

Føroyar hava sum kunnugt síðan 1974 havt eina samhandilsskipan við EF, sum hevur givið okkum møguleika at flyta allar iðnaðarvørur og nakrar útvaldar týdningarmiklar fiskavørur inn í EF við skerdum ella ongum tolli. Í Danmark hava allar føroyskar vørur verið tollfrían.

Seinasta heyst boðaði EF-kommissiónin donsku stjórnini frá, at hon var ónøgd við tollfrælsið á føroyskum vørum í Danmark, sum hon vildi hava skert ella avtikið. Danska stjórnin vísti hesum kravi aftur; men eftir avtalu við føroyskar myndugleikar segði hon seg vera til reiðar at samráðast um at endurskoða verandi handilsskipan millum Føroyar og EF.

Vegna løgtingsvalið og skipan av nýggjum landsstýri var fyrsti fundur á politiskum stigi um hetta mál ikki hildin fyrrenn í byrjanini av mars mánaði í ár í Bryssel. Har gjørdi løgmaður EF-kommissiónini greitt, at Føroyar vildu nýta hetta høvi til

at fáa í lag eina frælsari og rúmari handilsskipan enn hana, vit høvdu havt síðan 1974. Vit skutu upp, at upplýsandi og fyrireikandi samráðingar vórðu førdar á embætismannastigi, áðrenn farið varð undir samráðingar á politiskum stigi.

Hesar fyrireikandi samráðingar byrjaðu við fundi í Føroyum í mai. Tær hildu fram í Bryssel fyrst í juli og verða væntandi fullførdar í Keypmannahavn fyrst í september.

Frá føroyskari síðu hava vit gjørt vart við, at avgerð okkara um ikki at søkja um limaskap í EF stendur við. Hinvegin vilja vit hava mest møguligt tollfrælsi fyri føroyskar vørur í EF, serliga fiskavørur, og meta vit, at besta trygdin fyri slíkum tollfrælsi hevði fingist við einari umfatandi fríhandilsskipan, sum eisini hevði álagt Føroyum størri skyldur enn nú, tá ið talan er um tollfrían innflutning.

Um tað verður gjørligt at finna fram til eina semju um eina loysn, ið bæði kann ganga ynski okkara um mesta tollfrælsi í EF á møti og teirra ynski um, at føroyskar vørur skulu hava somu tollviðgerð í Danmark sum í øðrum EF-londum, er, sum nevnt, ov tíðliga at siga nakað um enn. Tað fer at koma til sjóndar, tá ið samráðingar á politiskum stigi byrja í heyst.

Annars roynir landsstýrið at fylgja við gongdini í Europa á samhandilsøkinum, bæði í tí, sum fer fram innanhýsis í EF, har tann innari marknaðurin verður fyrireikaður til at galda frá 1. januar 1993, eins og í royndunum at økja um samvinnuna millum EF og EFTA.

Landsstýrið hevur umhugsað møguleikan fyri limaskapi í ella tilknýti til EFTA; men eiga samráðingar okkara við EF, sum keypir tríggjar fjórðingar av fiskaútflutningi okkara, at koma í fremstu røð. Um tað miseydnast, eiga vit sjálvsagt at kanna, hvørjir aðrir møguleikar eru tøkir.

Annars er at siga, at ein avtala um fríhandil við Finnland, sum fer at geva okkum tollsømdir fyri ávísar fiskavørur í Finnlandi, fer at koma í gildi í næstum.

Teir triggir flokkarnir, sum nú skipa landsstýrið, eru politiskt ógvuliga ymiskir; men teir eru gingnir saman fyri at taka saman hendur at endurreisa føroyska búskapin og fyri at fáa samfelagshjólini aftur at mala og at mala rætt.

Bæði alment og privat hava føroyingar brúkt meir, enn teir hava vunnið.

Í almenna og í privata húsarhaldinum eins væl og í vinnufyritøkunum má annað skinn takast um bak. Øll fara vit at kenna farran av teim ábótum, ið gerast skulu.

Minkað verður um almenna virksemið og bæði vinnan og einstaki føroyingurin koma at taka tung tøk.

Tað plaggið, sum eitur føroyskt vinnulív, sum nú verður vovið, fær onnur mynstur enn tað hevur havt. Krøvini, sum marknaðarsamgongur uttaneftir seta, fara at hava sína ávirkan; men eisini eitt mynstur, sum í langa tíð hevur verið sera sjónligt, fer næstan at hvørva. Í framtíðini verða almenn veðhald burtur í figgingarskipanum.

Sjálvt um vit ikki hava okkara egna gjaldoyra, so hava vit í mong ár "devaluerað" - niðurskrivað krónuvirðið við vaksandi nýtslu, meiri studningi, hægri lønum og hægri skattum og gjøldum.

Nú er tíðin komin, at vit av álvara fara at hugsa um at "revaluera" - at uppskriva okkara gjaldoyra við at minka um nýtsluna, lækka lønirnar og lækka skattin.

Gøtan er gongd; men um tað eydnast at ganga hana og vinna á mál, velst um hegni, ágrýtni og vilja politikaranna og upp aftur meira undirtøku fólksins.

Val av nevndum

Nevndir vórðu valdar 2. august 1989.

Figgjarnevnd:

Fastir limir:	Tiltakslimir:
1. Flemming Mikkelsen	1. Pauli Ellefsen
2. Eilif Samuelsen	2. Sune Jacobsen
3. Jógvan Durhuus	3. Finnbogi Ísaksen
4. Heine O. Heinesen	4. Karin Kjølbro
5. Anfinn Kallsberg	5. Poul Michelsen
6. Jørgen Thomsen	6. Vilhelm Johannesen
7. Tordur Niclasen	7. Niels P. Danielsen

Fiskivinnunevnd:

Fastir limir:	Tiltakslimir:
1. Sune Jacobsen	1. Flemming Mikkelsen
2. Jógvan I. Olsen	2. Edmund Joensen
3. Jógvan Durhuus	3. Hergeir Nielsen
4. Signar Hansen	4. Heine O. Heinesen
5. Svend Aage Ellefsen	5. John Petersen
6. Henrik Old	6. Jógvan A. Johannesen
7. Tórbjørn Poulsen	7. Lasse Klein

Marknaðarnevnd:

Fastir limir:	Tiltakslimir:
1. Pauli Ellefsen	1. Edmund Joensen
2. Sune Jacobsen	2. Eilif Samuelsen
3. Hergeir Nielsen	3. Karin Kjølbro
4. Poul Michelsen	4. Óli Breckmann
5. Jógvan við Keldu	5. John Petersen
6. Atli P. Dam	6. Marita Petersen
7. Niels P. Danielsen	7. Tordur Niclasen

Samferðslunevndin:

1. Flemming Mikkelsen
2. Finnbogi Ísakson
3. Heini O. Heinesen
4. John Petersen
5. Svend Aage Ellefsen
6. Jógvan A. Johannesen
7. Lasse Klein

Rættarnevndin:

1. Eilif Samuelsen
2. Jógvan Durhuus
3. Poul Michelsen
4. Marita Petersen
5. Tordur Niclasen

Skattanevndin:

1. Jógvan I. Olsen
2. Heini O. Heinesen
3. Jógvan við Keldu
4. Atli Dam
5. Torbjørn Poulsen

Almanna- og heilsunevndin:

1. Flemming Mikkelsen
2. Signar Hansen
3. Olaf Olsen (Jógvan á Lakjuni)
4. Jákup Lindenskov
5. Niels Pauli Danielsen

Mentannar- og skúlanevndin:

1. Eilif Samuelsen
2. Hergeir Nielsen
3. Olaf Olsen (Jógvan á Lakjuni)
4. Jógvan A. Johannesen
5. Lasse Klein

Landbúnaðarnevndin:

1. Jógvan Olsen
2. Jógvan Durhuus
3. Óli Breckmann
4. Henrik Old
5. Tordur Niclasen

Íðnaðarnevndin:

1. Edmund Joensen
2. Heini O. Heinesen
3. John Petersen
4. Vilhelm Johannesen
5. Niels P. Danielsen

Umhvørvisnevndin:

1. Edmund Joensen
2. Finnbogi Ísakson
3. Eliesar Arge
4. Marita Petersen
5. Lasse Klein

Arbeiðaramálanevndin:

1. Jógvan T. Olsen
2. Karin Kjølbro
3. Eliesar Arge
4. Vilhelm Johannesen
5. Torbjørn Poulsen

Landsstýrismálanevndin:

1. Óli Breckmann
2. Hergeir Nielsen
3. Vilhelm Johannesen

Norðurlanda Ráðið:

Fastir limir:

1. Agnar Nielsen
2. Atli Dam

Tiltakslimir:

1. Flemming Mikkelsen
2. Jákup Lindenskov

Tingmannaráð Útnorðurs:

Fyri Fólkaflokkin vórðu valdir Anfinn Kallsberg sum fastur limur og Poul Michelsen sum varalimur, og fyri Tjóðveldisflokkin vórðu val Karin Kjølbro sum fastur limur og Jógvan Durhuus sum varalimur.

31. august 1989 vórðu Sigrun Joensen, Froðba og Leivur Johannesen, Tórshavn vald í nevndina fyri P/F Floglelðir.

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 14. februar 1990

F. L. j. nr. 1300-6-3

TIf. 11030 . Telex 81318 lagma fi . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð kl. 10—15, leygardag stongt

JN/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 1/1989: Avtøka av løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðslønum v.m.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðslønum v.m.

lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om pristalsbehandling af arbejdslønninger m.v.

§ 1. Løgtingslóg nr. 36 frá 21. mai 1975 um prístalsviðgerð av arbeiðsløn við seinni broytingum verður sett úr gildi. Reglur í arbeiðsviðurskiftum sambært sáttmála, siðvenju, gerðardómi ella tílíkt um prístalsviðgerð av lønum fara úr gildi. Dýrtíðarviðbøtur, sum rættur er vunnin til, áðrenn henda lóg er komin í gildi, verða varðveittar.

§ 1. Lagtingslov nr. 36 af 21. maj 1975 om pristalsbehandling af arbejdslønninger med senere ændringer ophæves. Regler i arbejdsforhold i henhold til overenskomst, sædvane, voldgiftsdom eller lignende om pristalsregulering af lønninger bortfalder. Dyrtidstillæg, som ret er erhvervet til før denne lovs ikrafttræden, bevares.

§ 2. Í løgtingslóg nr. 39 frá 5. august 1971 um samsýning landsstýrismanna við seinni broytingum gongur § 4 út.

§ 2. I lagtingslov nr. 39 af 5. august 1971 om vederlag til landsstyresmænd med senere ændringer ophæves § 4.

§ 3. Í løgtingslóg nr. 51 frá 9. mai 1976 um samsýning løgtingsmanna við seinni broytingum verða hesar broytingar gjørdar:

1) § 7, stk. 1, gongur út.
2) Í § 7, stk. 2, sum verður § 7, stk. 1, gongur orðið "harafturat" út.
3) § 7, stk. 3, gongur út.

§ 4. Í løgtingslóg nr. 37 frá 5. august 1971 um tænastumannaløniir v.m. og flokking av tænastumannastørvum við seinni broytingum ganga § 4 og § 5 út.

§ 5. Í løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirløniir við seinni broytingum verða hesar broytingar gjørdar:

1) Í § 26 gongur stk. 1 út.
2) Í § 26, stk. 3, sum verður stk. 2, verður "1. - 2. stk." broytt til: "stk. 1"

§ 6. Í løgtingslóg nr. 38 frá 22. juni 1972 um eftirløniir eftir eldri lógum verður í § 3 "1. og 2. stk.", broytt til: "stk. 1".

§ 7. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3. I lagtingslov nr. 51 af 9. mai 1976 om vederlag til lagtingsmænd med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 7, stk. 1, ophæves.
2) I § 7, stk. 2, som bliver § 7, stk. 1, udgår ordet "ogsà".
3) § 7, stk. 3, ophæves.

§ 4. I lagtingslov nr. 37 af 5. august 1971 om tjenestemandslønninger og klassificering af tjenestemandsstillinger med senere ændringer ophæves § 4 og § 5.

§ 5. I lagtingslov nr. 32 af 5. juli 1971 om tjenestemandspension med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 26 ophæves stk. 1.
2) I § 26, stk. 3, som bliver stk. 2, ændres "stk. 1-2" til: "stk. 1".

§ 6. I lagtingslov nr. 38 af 22. juni 1972 om pensioner efter tidligere love ændres i § 3 "stk. 1-2" til: "stk. 1".

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Sum ein liður í roymdum landsstýrisins at halda kostnaðarstøðinum í samfelagnum niðri verður við hesum lagt fram uppskot um at avtaka lógina um prístalsviðgerð av arbeiðslønum v.m.

Henda skipanin hevur havt við sær eina ávísa inflatoriska ávirkan, sjálvt um hon seinru árini, aftaná at prístalið tvær ferðir hevur verið "nullstillað", ikki hevur veitt fult prístalsendurgjald.

Í øðrum londum, sum hava havt líknandi skipan, hává teir avtikið hana fyri fleiri árum síðani. Í Danmark var skipanin avtikin endaliga í 1986.

Lógarbroytingin hevur við sær, at prístalsviðgerðin verður avtikin fyri allar lønir og aðrar veitingar, sum verða útroknaðar eftir lønaravtalum. Hetta fevnir t.d. um dagpeningaupphæddirnar og nakrar veitingar eftir forsorgarlógini og tænastumannapensiónir v.m.

Herafturímóti er lógin ikki galdandi fyri fólka- og avlamispensiónir, tí hesar verða viðgjørdar eftir donskum reglum og donskum prístali. Í Danmark er prístalsviðgerðin ikki avtikin fyri hesar pensiónir. Kortini hevur danska stjórnin boðað frá, at hetta møguliga verður gjørt.

Prístalsviðgerð fer eisini fram á øðrum økjum, t.d. tá tað snýr seg um leigumál. Landsstýrið hevur ætlanir um at uppsiga allar leigusáttmálar, har prístalsviðgerð er partur av leigaútroknaðingini, fyri at fáa hana burtur.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/Klaus Hermann

A L I T

Løgtingsmáli nr. 1/1989: Avtøka av løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðslønum v.m..

Málið er lagt fram av Føroya landsstýri hin 14. febr. 1990 og eftir 1. viðgerð hin 20. febr. beint í arbeiðaramálanevndina.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur landsstýrið, at hetta er ein liður í royndunum at halda kostnaðarstøðinum í samfelagnum niðri. Sum tað skilst, er tað bert í Føroyum, at vit hava prístalsviðgerð av arbeiðslønum. Seinasta landið, ið hevur havt hesa skipan, er Danmark. Í 1976 varð "Lønarbejdernes Dyrtidsfond" skipaðar og viðbøturnar, ið hækkaða prístali vórðu "frystar" og lagdar í grunn. Stjórnin, ið kom aftaná, suspenderaði skipanina um prístalsviðgjørdar lønir og avtók skipanina endaliga í 1986. Eftir at pristalsskipanin varð suspenderað, royndi danska stjórnin at seta hámark yvir, hvussu nógv lønin kundi hækka, í einum niggjum sáttmálaskeiði. Báðu ferðirnar, hetta varð roynt, miseydnaðist, tí hvørki arbeiðsgevarar ella arbeiðarafeløg hevdu hug at fylgja áheitanini. Í 1987, kom vend í, og fýra ára sátttmáli varð gjørdur, har avtala varð gjørd um alt fyri fýra ár, m.a. at seta arbeiðstíðina niður frá 40 til 37 tímar í einum 4 ára skeiði. Sjálvur lønarsáttmálin skuldi tó vera fyri tvey ár. Seinasti lønarsáttmáli, sum gjørdur er í 1989, er eisini gjørdur fyri tvey ár. Eftir tí, ið verður sagt frá LO, verður hildið ógvuliga sannlíkt, at næsti sáttmáli eisini fer at ganga yvir tvey ár.

Landsstýrið hevur ongantíð gjørt eina umsøgn (responsum) um, hvørja ávirkan lógin um prístalsviðgerðina fær fyri galdandi lønarsáttmálar. Í hesi umsøgn verður sagt:

"Um fortreytirnar fyri verandi lønarsáttmálum eru burtur, um so er at pristalsviðgerðin verður avtikin, er at siga, at avtøkan av pristalsviðgerðini út frá einum løgfrøðiligum sjónarmiði ikki í avgerandi mun beinir fortreytirnar fyri galdandi lønarsáttmálum burtur. Hetta serliga, tá hugsað verður um, at á teimum stóru økjunum heva løntakararnir fingið munandi størri lønhækkingar við samrádingum enn av pristalsviðgerð."

Spurningurin um at avtaka pristalsviðgerðina av lønum er ein avtala, ið samgonguflokkarnir hava gjørt í sambandi við skipan av landsstýri. Áðrenn landsstýrið lagði uppskotið fyri tingið, vórðu umboð fyri samskipanarbólkinum av fakfeløgum til fundar við landsstýrið.

Á hesum fundi løgdu fakfeløgini m.a. dent á, at møguligt hevði verið at bøtt um kappingarførið við betri útbúgving. Til tess at bøta um búskaparviðurskiftini mælti fakfeløgini til at seta rentuskattin upp úr 1 til 1½%.

Eisini vóru niðanfyrinevndu uppskot umrødd:

Steðga rentuspekulatiónini.
Avtøka av rentufrádrátti av brúkaralánum.
Hækka skattahámarkið fyri inntøkur yvir kr. 300.000,-.
Útfluttningsavgjald uppá 1% til vørumenning.
Skatting av inngjaldinum til erfiðlanir.
Broyting av reglum um kapitalinnskot.
Reklamuskatt.
Broyting av reglunum um bíðipening til løgtings- og landsstýrislimir eins og politiskari upplýsing.
Kapitalvinningsskattur og at seta rentuna niður á sethúsalánum.

Arbeiðaranevndin hevur viðgjørt uppskot landsstýrisins og hevur býtt seg í ein meiriluta, og ein minniluta. M.a. verður hildið, at tá lógin um avtøku av pristalsviðgerð av arbeiðslønum verður framd, eigur eisini møguleikin fyri at pristalsviðgera húsaleigur at falla burtur.

Meilutin (Karin Kjølbro, Jákup Lamhauge og Eliesar Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og setir harumframt soljóðandi:

U P P S K O T

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum í hesi tingsetu at leggja uppskot fyri tingið um lógarbroyting, ið tekur burtur møguleikan fyri prístalsviðgjørdum húsaleigum.

Minnilutin (Tórbjørn Poulsen og Vilhelm Johannesen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins um avtøku av prístalsviðgerð av arbeiðslønum v.m. av niðanfyri nevndu høvuðsorsøkum:

1. Tann útjavning av lønarlagnum, sum galdandi prístalsskipan fremur, fellur burtur.
2. Tað eru eingi prógv førd fram um, at prístalsviðgerð av arbeiðslønum er inflatiónsframbjandi - heldur tvørturímóti.
3. Hetta tiltak samgongunnar er eitt afturat so mongum øðrum, sum einvíst eru rættað ímóti lønmóttakaranum.
4. Tað er heilt burturvið, at avtaka prístalsviðgerðina av arbeiðslønum miðskeiðis í einum sáttmálaskeiði.

ARBEIÐARAMÁLANEVNDIN, 13. mars 1990.

Karin Kjølbro Jákup Lamhauge Eliesar Arge

Tórbjørn Poulsen Vilhelm Johannesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 1. august 1989

Tlf. 11080. Telex 81318 finpex fa. Telefax 14941. Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

F. L. j. nr. 1320-1
(at tilskilja í svari)

JN/BH

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 2/1989: Broyting í løgtingslóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.	lagtingslov om ændring af lagtingslov om solidarisk arbejdsmarkedspensionsfond.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 71 frá 9. juni 1988 um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn verða gjørdar hesar broytingar:	I lagtingslov nr. 71 af 9. juni 1988 om solidarisk arbejdsmarkedspensionsfond foretages følgende ændringer:
1. Í § 12, stk. 1, verður "1. januar 1990" broytt til: "1. januar 1991".	1. I § 12, stk. 1, ændres "1. januar 1990" til: "1. januar 1991".
2. Í § 12, stk. 2, verður "1. januar 1990 - 31. desembur 1993" broytt til: "1. januar 1991 - 31. desembur 1994".	2. I § 12, stk. 2, ændres "1. januar 1990 - 31. december 1993" ændret til: "1. januar 1991 - 31. december 1994".

3. í § 12, stk. 3, verður "1. januar 1994 - 31. desembur 1995" broytt til: "1. januar 1995 - 31. desembur 1996".

4. í § 12, stk. 4, verður "1. januar 1996 - 31. desembur 1997" broytt til: "1. januar 1997 - 31. desembur 1998".

5. í § 12, stk. 5, verður "1. januar 1998 - 31. desembur 1999" broytt til: "1. januar 1999 - 31. desembur 2000".

6. í § 12, stk. 6, verður "1. januar 1991" broytt til: "1. januar 1992".

7. í § 12, stk. 7, verður "1991" broytt til: "1992".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1990.

3. I § 12, stk. 3, ændres "1. januar 1994 - 31. december 1995" til: "1. januar 1995 - 31. december 1996".

4. I § 12, stk. 4, ændres "1. januar 1996 -31. december 1997" til: "1. januar 1997 - 31. december 1998".

5. I § 12, stk. 5, ændres "1. januar 1998 - 31. december 1999" til: "1. januar 1999 - 31. december 2000".

6. I § 12, stk. 6, ændres "1. januar 1991" til: "1. januar 1992".

7. I § 12, stk. 7, ændres "1991" til: "1992".

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1990.

Viðmerkingar:

Í tingsetuni 1987 varð samtykt lóg um samhaldsfasten arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Lógin ásetur at byrjast skal at gjalda inn í grunnin tann 1. januar 1990.

Av tí, at nógv fyrireikingararbeiði enn er at gera og ymiskar kanningar viðvikjandi ávirkanini av lógini skulu gerast, skjýtur landsstýrið upp, at øll tíðarásetan í lógini verður útsett eitt ár.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/

/ Klaus Hermann

Føroya Javnaðarflokkur

Tórshavn 28. december 1989 F.L. j.nr. 1320-1

BROYTINGARUPPSKOT

Í uppskoti landsstýrisins í løgtingsmáli nr.2/1989 um broyting í løgtingslóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn verður gjørd hesa broyting:

1) Í § 1 verður í stk. 1 gjørd soljóðandi broyting: "1. januar 1991" verður broytt til "1 apríl 1990."
2) Í § 1 verða stk. 2,3,4,5,6 og 7 strikað.

1) I § 1, stk. 1 ændres ordene "1. januar 1991" til "1. april 1990."
2) I § 1 udgår stk. 2,3,4,5,6 og 5.

Í aðru syftu setur Javnaðarflokkurin fram soljóðandi:

I Uppskot

til

samtyktar

"Løgtingið áleggur landsstýrinum beinanvegin at geva Líkningarráð føroya boð um at fara undir tær teknisku fyrireikingar, ið standast av at lógin um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn skal virka í seinata lagi fra 1. januar 1991."

Og setur Javnaðarflokkurin fram soljóðandi:

II Uppskot

til

samtyktar

"Landsstýrinum verður álagt at leggja uppskot fyri løgtingið um broyting í lógini um tvungna uppsparing soleiðis, at inntøkubólkurin kr. 110.000 - 150.000 verður fritikin fyri samansparing. Inntøkubólkurin kr. 150.000 - 200.000 og omanfyri kr. 200.000 spara saman ávíkavist 2% og 3% í 1990."

Á FØROYA LØGTINGI, 28. december 1989.

Vilhelm Johannesen Atli P. Dam Jørgen Thomsen

Jákup Lindenskov Jógvan A. Johannesen Marita Petersen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

TF. 11088 . Telex 81310 tlugns fo . Telefax 14942 . Posthox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

1. august 1989

F. L. j. nr. 1205-21
(at tilskila í svarið)

JH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 3/1989: Veðhald fyri láni til SEV.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til SEV.	lagtingslov om garanti for lån til SEV.
§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri uttanlandsláni til el-felagið SEV svarandi til 50 mió. kr.	§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et udenlands lån til el-selskabet SEV svarende til 50 mio. kr.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Landsstýrið gav í vár el-felagnum SEV loyvi til at taka upp lán tilsamans 100 mió. kr. Lánið skuldi nýtast til fígging av leysaskuld í samband við vatnorkuútbyggingina í Eysturoy.

Av teimum omanfyri nevndu 100 mió. kr., sum landsstýrið gav loyvi til at lána, hevur felagið nú fingið játtað lán frá Nordisk Investeringsbank (NIB) uppá tilsamans 50 mió. kr.

NIB hevur sett sum treyt fyri at veita hetta lánið, at landskassaveðhald verður veitt fyri láninum.

Landsstýrið loyvir sær at mæla løgtinginum til at veita neyðuga lógarheimild til nevnda veðhald.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/
/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 3/1989: Veðhald fyri láni til SEV.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 19. september 1989 og eftir 1. viðgerð 18. oktober beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í eitt meiriluta og tveir minnilutar.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og í hesum sambandi havt fund við landsstýrismannin Ivan Johannesen, orkuráðið og SEV.

Málið snýr seg um at geva landsstýrinum heimild til at veðhalda fyri einum láni frá N.I.B. upp á 50 mió. kr. Hetta er partur av láni, sum landsstýrið 19. mai 1989 gav SEV loyvi til at taka upp á tilsamans 100 mió. kr.. Hinar 50 mió. kr. hevur SEV fingið í láni frá íløgugrunninum.

Í hesum sambandi hevur fíggjarnevndin eisini viðgjørt ta víðaru útbýggingina í Eysturoy. Tað kom fram undir viðgerðini, at bæði orkuráðið og SEV eru á einum máli um, at tann gjørda íløgan í Norðureysturoy onga meining hevði, um tann víðari útbyggingin ikki heldur fram, fyri at samla tað neyðuga vatnið, fyri at fáa tað fíggjarliga støðið so gott sum møguligt.

Orkuráðið legði áherðslu á, at mest fekst fyri peningin, um hildið var á við útbyggingini á vestursíðuni, men mælti til at gera nýggjar útrokningar um farast skuldi upp í hædina.

Tey neyðugu loyvi til at fara undir útbygging av Eiði 1 og 3 hevur SEV fingið.

Meðan landsstýrið í sini tíð loyvdi SEV at fara í gongd við Eiði 1 fyri 208 mió. kr. í 1984-krónum uttan rentur, er kostnaðurin nú, tá arbeiðið viðvíkjandi Eiði 1 er liðugt, komin upp á 400 mió. kr. umleið.

Orsøkin til hendan meirkostnað er fyrst og fremst tað ovurstóra byggivirksemið, ið farið er fram í landinum, og sum serliga hevur gjørt tað trupult at útvega neyðuga arbeiðsmegi.

Aftrat hesum kemur byggirentan.

Í skrivi frá 19. mai 1989 hevur landsstýrið við ávising til loyvisbrævs sítt til SEV um at upptaka 100 mió. kr. í láni til figging av leysaskuld til Højgaard & Schultz sagt frá, at landsstýrið gongur út frá, at SEV roynir at gera seg leyst av sáttmálanum við Højgaard & Schultz viðvíkjandi ti víðari útbyggingini av vatnverkinum í Eysturoy, og at SEV ikki fer í gongd við víðari útbygging av vatnorkuni í Eysturoy, áðrenn neyðug loyvi frá landsstýrinum fyriliggja.

Somuleiðis treytar fíggjarnevndin sær, at hetta lánið ikki verður nýtt til nýíløgur í skrivstovubygning í Tórshavn.

Út frá hesum tekur meirilutin (Anfinn Kallsberg, Heini O. Heinesen, Jógvan Durhuus, Flemming Mikkelsen og Eilif Samuelsen) undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja hetta.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og hevur hesar viðmerkingar:

Av tí at vatnorkubygging hevði ligið á láni í meira enn 20 ár, var undir samgongusamráðingunum um ársskiftið 1984/85 uppskot frammi um, at landið átók sær útbyggingina av vatnorkuni í Føroyum og síðani lat SEV lidnu verkini at reka.

Fyri at tryggja, at SEV fekk leyst seg frá ymsum ráðgevarum og byggifeløgum, og at hægsti myndugleiki, Orkuráðið kundi fáa høvi til at góðkenna ella leggja til rættis eina skipaða íløguætlan soleiðis, at jøvn útbygging kundi fara fram áhaldandi uttan slit eilla ovurvirksemi yvir eitt tíðarskeið t.d. 15-20 ár, og at íløgurnar vórðu raðfestar í manntímum og krónum pr. ár, svarandi til einar 50-70 mió.kr. árliga.

Semja fekst ikki um hetta, men í staðin varð avrátt, at útbyggja vatnorkuna í Norðureysturoy fyri 208 mió.kr., sjálvandi íroknað byggirentur og inflatión, sum leggjast má upp fyri í einumhvørjum projekti.

Tað kom fram frá hægsta sakkunnleika okkara, at hesin fyribils bert kundi tilmæla eina heilt lítla útbygging í Norðureysturoy, tí neyðugar kanningar vóru ikki gjørdar.

Tá hesar kanningar vóru komnar nakað ávegis, stóð vísindaliga prógvað, at við ætlaðu útbyggingum fóru 40% av tøku orkuni fyri skeyti, og at ein útbygging í hæddini varð minni í vavi og fyri hvønn framleiddan kilovatttíma uttan iva mikið bíligari.

Roynt varð at fáa SEV til at fremja slíka útbyugging, men til fánýtis.

Arbeiðið helt tískil fram, og tá ið 72 mió. kr. vóru nýttar uttan heimild, søkti SEV landsstýrið um lánloyvi til hesar. Eftir drúgvar tingingar, sum avdúkaðu, at avleiðingarnar av hesi skuld til byggifelagið kundu gerast sera álvarsligar fyri føroyska samfelagið, eftirlíkaði landsstýrið umsóknina um lánloyvi, men við ti treyt, at felagið ikki setti seg í skuld aftur til byggifelag ella nakran "leverandør".

Kortini so standa vit í teirri støðu í dag, at SEV ikki hevur hildið hesar treytir, tí hevur fíggjarnevndin tryggja sær, at ikki nýggj leysaskuld er íkomin.

Javnaðarflokkurin kann tí ikki taka undir við hesum uppskoti, men mælir til, at SEV sjált ber ábyrgdina av hesum peningi.

Eftir tí, ið skilst, so er SEV komið í eina ógvuliga stóra lániskuld. Tí heldur javnaðarflokkurin, at rætt er at seta nevnd at kanna øll viðurskifti í hesum sambandi. Ikki fyri at koma SEV í trupulleikar, tí flokkurin tekur undir við hugsjónini um samrakstur av týðandi samfelagstænastum, men júst tí er tað neyðugt at tryggjað verður, at hesin verður fyriskipaður so skynsamt sum gjørligt er, og við serligum atliti til umhvørvisvernd.

Slíka fremja vit, um vit fáa mest møguligt burtur úr varandi orkudeldum.

Rætturin til reint umhvørvi verður ein hin størsti politiski spurningurin komandi 30-50 árini. Hesin verður ein av grundstólpunum undir framtíðarinnar demokratii. Tí skulu tær náttúrligu orkudeldurnar røkjast og troytast skynsamt, tí er hetta eitt stórmál.

Minnilutin setur tí í staðin fyri uppskot meirilutans soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Við serligum atliti til umhvørvisvernd velur løgtingið 6 limir í 9 mannanevnd, ið hevur til uppgávu at kanna øll viðurskifti í samband við vatnorkuútbygging SEV's framda og komandi.

Landsstýrið tilnevnir 3 limir til somu nevnd. Hesir skulu hava verkfrøðingaliga, roknskapar/rakstrarliga og løgfrøðiliga serútbúgving.

Nevndin verður í arbeiði sínum at søkja sær ráðgeving frá orkuráðnum og øðrum stovnum.

Minnilutin (Tordur Niclasen) tekur støðu í tingsalinum.

FÍGGJARNEVNDIN, 31. januar 1990.

Anfinn Kallsberg

Flemming Mikkelsen

Heine O. Heinesen

Eilif Samuelsen

Jørgen Thomsen

Jógvan Durhuus

Tordur Niclasen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11080 . Telex 81310 tinghs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. leygardag stongt

2. august 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari)

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 4/1989: Broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar.

§ 1.

Í § 1, stk. 2, pkt. 1) í løgtingslóg nr. 62 frá 9. juni 1988 um ávísar skúlar verður gjørd henda broyting:
"Gymnasiala útbúgving í Gøtudali í Eysturoy" verður broytt til: "Gymnasiala útbúgving á Kambsdali.".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om bestemte skoler.

§ 1.

I § 1, stk. 2, pkt. 1) i lagtingslov nr. 62 af 9. juni 1988 om bestemte skoler foretages følgende ændring:
"Gymnasial uddannelse i Gøtudali i Eysturoy" ændres til: "Gymnasial uddannelse i Kambsdali.".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Í seinastu landsstýrissamgongu varð spurningurin um bygging av HF- og Studentaskúla í Eysturoy viðgjørdur. Tásitandi samgonga tók ta avgerð, at HF- og Studentaskúlin skuldi byggjast á Kambsdali, um peningaligir og undirvisingarligir fyrimunir vóru av nevndu flyting. Kanningin, ið gjørd varð vísti, at stórir fyrimunir vóru um skúlin varð sambygdur við Handilsskúlan á Kambsdali, og varð tí uppskot lagt fyri tingi, ið mælti til at fylgja kanningarúrslitinum, ið nevndin var komin til. Málið varð tó ikki avgreitt í tinginum, og fall sostatt burtur.

Sitandi landsstýrissamgonga hevur tikið ta støðu, at HF- og Studentaskúlin í Eysturoy skal sambyggjast við Handilsskúlan á Kambsdali, tí hetta gerst munandi bíligari bæði í bygging og rakstri.

Nevndin, ið gjørdi kanningar í málinum um bygging av studentaskúla í Eysturoy sigur m.a. í áliti sínum, at verður skúlin bygdur í Gøtudali, verður kostnaðurin mettur til 43.900.000 kr.

Verður skúlin bygdur á Kambsdali, tó ikki sambygdur við handilsskúlan, verður kostnaðurin mettur til 34.400.000 kr., t.v.s. 9,5 mió. kr. bíligari.

Verður skúlin hinvegin bygdur saman við handilsskúlanum, verður kostnaðurin mettur til 29.100.000 kr. ella 14,8 mió. kr. bíligari enn um bygt verður í Gøtudali.

Orsøkin til at byggiútreiðslurnar verða so munandi lægri, um bygt verður saman við handilsskúlanum er m.a., at skúlarnir kunnu nýta nøkur høli í felag, sum t.d. kantinu, 2 skúlastovur, pæd. verkstað, verkstað til húsavørð, ið verður mett tilsamans til umleið 300 fermetrar (4,8 mió. kr.)

Harumframt gerst ikki neyðugt við tveimum fimleikahallum, men bert tí einu, tí ætlanin er at nýta ítróttarhøllina, ið Gøta, Leirvík og Fuglafjørður eiga í felag. Eisini verður nakað av uttanduraøki felags og gevur tað eina sparing uppá umleið 500.000 kr.

Á Kambsdali er vegur gjørdur, stórt parkeringsøki, allar tekniska íbindingar eru klárar, sum kloakk við reinsiverki, vatn, telefon og el.

Um rakstrarútreiðslurnar sigur nevndin, at samanumtikið verður roknað við einum ódýrari rakstri við sambygging. Upphædd úr 600.000 kr. uppí 900.000 kr., alt eftir, hvussu langt ein vil ganga í samstarvinum, verður nevnt.

Uppá fyrispurning um tað eru undirvísingarligir fyrimunir við at sambyggja, sigur nevndin, at tað eru sera góðir møguleikar fyri undirvísingarligum fyrimunum við at skúlarnir liggja so nær saman sum møguligt:

- vit kunnu í ávísan mun hava felags lærarar
- ikki er neyðugt við ferðing millum skúlarnar
- nýta tilfeingið meira rationelt
- bjóða lærugreinir ella modulir hvør til annan
- spara ávísum næmingum tíð
- veita øðrum betri rættindi
- nýggja útbúgvingar
- gera føroyskar royndir.

Nevndin, ið hevur gjørt kanningarnar, hevur á fundi við handilsskúlan viðgjørt spurningin um at byggja skúlan nær nýggja handilsskúlanum, har næmingaheim handilsskúlans skuldi byggjast. Á hesum fundi var upplýst, at handilsskúlin hevur fingið ávíst annað stað nærhendis at byggja ætlaðu íbúðirnar á. Niðurstøða handilsskúlans var, at hann í prinsippinum góðtekur, at nýggi HF- og studentaskúlin kann byggjast á nevnda øki undir ávísum treytum, sum t.d. útsjónd o.a.

Sitandi landsstýrið hevur gjørt uppaftur fleiri kanningar av hesi ætlan, ið allar benda á, at skilaðasta og bíligasta loysnin er at sambyggja HF- og studentaskúlan við Handilsskúlan á Kambsdali.

Signar Hansen
landsstýrismaður

/
/ Jalgrim Hilduberg

Løgtingsmáli nr. 4/1989: Broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 19. september 1989 og eftir 1. viðgerð 21. september beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 27. september og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Eilif Samuelsen, Hergeir Nielsen og Jógvan á Lakjuni) vísir á, at landsstýrið hevur upplýst, at gjøllligar kanningar av royndunum viðvíkjandi fjølbreytaskúlum í øðrum norðanlondum vísa sera góð úrslit, og hevur nevndin fingið skjal viðvíkjandi royndunum av fjølbreytaskúlunum í Íslandi.

Nevndin hevur eisini frá landsstýrinum fingið útvegað kostnaðarmetingar frá tveimum arkitektastovum í Føroyum, og vísa teirra tøl seg at samsvara við tað tilfar, ið landsstýrið áður hevur útvegað í fyriliggjandi løgtingsmáli.

Omanfyrinevndi meiriluti mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Lassi Klein) vísir á, at einasta orsøkin til, at tjóðveldisflokkurin er farin í samgongu við fólkaflokkin og sambandsflokkin, er tann, at hann hevur fingið lyfti um, at hesir flokkar vilja atkvøða fyri, at Studentaskúlin og HF-skeiðið flytur heimstað úr Gøtudali á Kambsdal.

Afturfyri hevur tjóðveldisflokkurin játtað at fara upp í samgongu við umrøddu flokkar, og er m.a. gingin við til:

1) at spreingja 50% skattahámarkið,
2) bundnu tvungnu uppsparingina,
3) at taka av prístalsviðgerðina av lønum,
4) at skerja bundna barnapeningin munandi,

5) at avtaka serviðbót til fólkapensiónistar,
6) at útseta samhaldsføstu pensiónina,
7) uppsøgnir av almennum sjófólkum,
8) uppsøgnir av almennum verkafólkum.

Bert fyri at nevna nøkur mál, sum liggja til grund fyri løgtingsmáli nr. 4/1989: Broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar.

Ítøkiligar almennar byggingar hava prógvað, at tað er kostnaðarmikiari við sambyggingum. Umframt hetta finnast eisini ítøkiligar privatar byggingar, sum eisini til fulnar prógva hesi sjónarmið.

Aðrar útrokningar, sum eru tingnar til vega, hava á ongan hátt sannført minnilutan um, at teirra tøl yvirhøvur kunnu brúkast í tí politiska leiki, sum hendan samgongan leggur upp til, og er hetta helst eisini orsøkin til, at meirilutin ikki vil útflýggja tey til nevndarlimirnar til nærri viðgerðar.

Tað tykist heilt ófatiligt, at so nógvir partar helst við vilja lata seg misbrúka - fyri at fremja málrættaðar uppgávur fyri ávísar persónar, bert við tí endamali at halda saman upp á eina samgongu, sum ein meiriluti av Føroya fólki ikki ynskir.

Prísurin at keypa skúlan á Kambsdali er dýrkeyptur, tað hava sjófólk, verkafólk og lønmóttakarar landsins fingið og fáa ótald prógv fyri.

Tí kann Sjálvstýrisflokkurin ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins, men heldur fast við Gøtudal. Eingi saklig sjónarmið eru fyri øðrum, hvørki skúlapolitiskir, tekniskir ella fíggjarligir fyrimunir. Tí kann bert vera talan um sokallaðar "rossahandlar", sum hava ført við sær, at samgongan hevur lagt hetta mál á tingbord til tingsins viðgerð av nýggjum.

Ein annar minniluti (Jógvan Adolf Johannesen) ger hesar viðmerkingar:

Í undanfarna valskeiði samtykti táverandi samgonga - javnaðarflokkurin, tjóðveldisflokkurin, sjálvstýrisflokkurin

og kristiligi fólkaflokkurin - ein sonevndan túlapakka, har studentaskúlin í Eysturoy skuldi byggjast í Gøtu kommunu. Í núverandi samgongu hevur tjóðveldisflokkurin skift støðu og ynskir, at skúlin í staðin verður bygdur í Fuglafjarðar kommunu.

Ásannandi, at núverandi samgonga hevur avrátt, at studentaskúlin í Eysturoy skal byggjast í Fuglafjarðar kommunu - sum eisini framgongur av samgonguskjalinum hjá sitandi landsstýri - og málið sostatt longu er avgjørt - setir minnilutin einki uppskot fram.

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 25. oktober 1989.

Eilif Samuelsen Jógvan A. Johannesen Hergeir Nielsen

Jógvan á Lakjuni Lasse Klein

~~Broytingar~~uppskot til løgtingsmál nr 4,
broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar.

Undirritaðu loyva sær hervið at seta fram solíóðandi ~~broytingar~~uppskot millum 2. og 3. viðgerð, so sum fráboðað er undir 1. og 2. viðgerð:

§

Nýggj § 2:

" Frá skúlaársbyrjan 1990 verður farið undir gymnasiala útbúgving í 1. og 2. G. á H.F.-skeiðnum í Klaksvík.

Niels Pauli Danielsen

Hanus Dahl Sørensen

Marita Petersen

Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 5. desember 1989

Tlf. 11088. Telex 81310 hlmvør fo. Telefax (298) Postboks 64
Kontorskrivstova: Kl. 10—15. Leyvarlag stongt

Tilv. nr. 1125-24

KH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 6/1990: Løgtingslóg um vinningsstoðg.

Uppskot

til

Løgtingslóg um vinningsstoðg.

§ 1. Vinnurekandi innan ídnað, handverk og handil mugu við sølu av vørum innanlands ikki taka hægri bruttovinning í % pr. vøru-eind enn tann pr. 1. desembar 1989 ella seinasta roknaða bruttovinning fyri somu ella tilsvarandi vøru.

Stk. 2. Bruttovinningurin eftir stk. 1 er fyri handverk og ídnað munurin millum sølupris og beinleiðis útreiðslur til rávørur, hjálpartilfar og beinleiðis arbeiðsløn, og fyri innflytarar, heilsølur og

Lagtingslov om avancestop.

§ 1. Erhvervsdrivende inden for industri, håndværk og handel må ved salg her i landet af varer ikke beregne højere bruttoavance i % pr. vareenhed end den pr. 1. december 1989 eller senest beregnede bruttoavance for samme eller tilsvarende vare.

Stk. 2. Ved bruttoavance efter stk. 1 forstås for industri og håndværk forskellen mellem salgspris og direkte udgifter til råvarer, hjælpematerialer samt direkte arbejdsløn og

detailhandlarar munurin millum sølugrís og innkeypsgrís við almennum gjøldum og vanligum útreiðslum at fáa vøruna heim løgdum aftrat. Er varan fallin í prísi, má bruttovinningurin í 3 ikki verða hægri enn frammanundan.
Stk. 3. Fyri tænastu- og flutningsvirksemi verður stk. 1 - 3 nýtt samsvarandi.

§ 2. Prísráðið hevur eftirlit við, at reglurnar í hesi lóg verða hildnar.
Stk. 2. Prísráðið kann í serstøkum førum geva undantaksloyvi frá reglunum í § 1.

§ 3. Vinnurekandi skulu eftir áheitan prógva, hvussu bruttovinningurin verður roknaður. Annars kann prísráðið krevja bruttovinningin lækkaðan til eina uppnædd, sum ráðið metir vanliga.

§ 4. Brot á reglugnar í § 1 verður revsað við bót ella hefti.
Stk. 2. Hann, ið gevur prísráðinum skeivar ella villleiðandi upplýsingar

for importører, grossister og detailister forskellen mellem salgspris og indkøbspris med tillæg af mulige indførselsudgifter og sædvanlige hjemtagelsesudgifter. Er varen faldet i pris, må bruttoavancen i 3 ikke være højere end før.
Stk. 2. For tjeneste- og transportvirksomhed gælder bestemmelserne i stk. 1-3 tilsvarende anvendelse.

§ 2. Prisrådet fører tilsyn med overholdelsen af bestemmelserne i denne lov.
Stk. 2. Prisrådet kan i særlige tilfælde undtage fra bestemmelserne i § 1.

§ 3. Erhvervsdrivende skal efter anmodning bevise, hvorledes bruttoavancen bliver beregnet. I modsat fald kan prisrådet kræve bruttoavancen nedsat til et beløb, som efter rådets skøn må antages at være normal.

§ 4. Overtrædelse af bestemmelserne i § 1 straffes med bøde eller hæfte.
Stk. 2. Den, som meddeler Prisrådet urigtige eller vildledende oplysninger

ella tegir um viðurskifti av týdningi fyri avgerð av einum máli, verður revsiábyrgd við bót ella hefti, um ikki hægri revsing er uppiborin eftir revsilógini.

Stk. 3. Er brotið framt av einum partafelag, lutafelag ella líknandi, kann bót áleggjast virkinum sum slíkum.

Stk. 4. Undir viðgerðini av málinum eftir hesi grein verða reglurnar í kapitul 69 í rættargangslógini nýttar á sama hátt sum í statsadvokatmálum.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

eller fortæler fornold er betydning for den pågældende sags afgørelse straffes med bøde eller hæfte, med mindre strengere straf er forskyldt efter straffeloven.

Stk. 3. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, anpartsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges virksomheden som sådan.

Stk. 4. Ved behandling af sager efter denne paragraf anvendes reglerne i lov om rettens pleje, kapitel 69, i samme omfang som i sager, der påtales af statsadvokaten.

§ 5. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sum partur av royndum landsstýrisins at tálma kostnaðarstøðinum í samfelagnum, verður lagt fram uppskot um vinningsstøðg.

Hetta lógaruppskot skal haldast saman við uppskoti til løgtingslóg um at arbeiðslønir v.m. ikki longur skulu koma undir prístalsviðgerð.

Tá verjan móti prísvøkstri, sum liggur í prístalsviðgerð, er burtur, er av týdningi á annan hátt at tryggja at brúkarin ikki fær størri útreiðslur.

Vinningsstøðgurin er møguligur at umsita og henda skipan varð roynd frá 1981 til 1984.

Reglurnar skulu skiljast soleiðis, at um ein vøra

kostar t.d. 100 kr. at keypa, so at lögin kemur í gildi, og vinningurin av nenni er 20 kr., so skal vinningurin ikki verða meir enn 20 kr., sjálvt um veran far at kosta t.d. 110 kr. at keypa.

Fer veran niður í t.d. 80 kr. at keypa, so skal hon ikki kosta meira enn 96 kr. at selja, tí vinningurin skal ikki verða meira enn 20%.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

Kjartan Poulsen

Á l í t

1

løgtingsmálí nr. 6/1989: Løgtingslóg um vinningssteðg.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. desember 1989 og eftir 1. viðgerð 24. januar 1990 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilúta og tveir minnilutar.

Lóg um vinningssteðg var í gildi frá 1981 til 1984. Umboð fyri príseftirlitið var á fundi við nevndina undir viðgerðini av málinum og greiddi frá, hvussu skipanin tá var at umsita. Upplýst varð, at lógin hevði virkað ettir síni ætlan.

Í uppskoti landsstýrisins er orðingin í § 1, stk. 3 soljóðandi: "Fyri tænastu- og flutningsvirksemi verður stk. 1 - 3 nýtt samsvarandi". Her er talan um eina prentvillu frá landsstýrinum, tá orðingin eigur at vera: "stk. 1 - 2", og setir meirilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1, stk. 3 verða orðini "stk. 1 - 3" broytt til "stk. 1 - 2".	I § 1, stk. 3 ændres ordene "stk. 1 - 3" til "stk. 1 - 2".

Undir 1. viðgerð boðaði løgmaður frá, at orðingin í § 1, stk. 1 er komin skeivt fyri, við tað at bruttovinningurin hvørki í krónum ella % má verða hægri enn sum tilskilað í

lógaruppskotinum og verður tí neyðugt at broyta nevndu grein samsvarandi.

Meirilutin (Edmund Joensen, Heini O. Heinesen og John Petersen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broyting og setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1, stk. 1 verða orðini "í %" broytt til: "hvørki í kr. ella %".	I § 1, stk. 1 ændres ordene "i %" til: "hverken i kr. eller %".

Heini O. Heinesen førir fram, tá núsitandi landsstýrissamgonga varð skipað, var serliga tosað um at lækka kostnaðarstøðið í samfelagnum, tá tað eru tey, sum halda, at hetta gerst við at avtaka prístalsskipanina av arbeiðslønum. Hetta er Heini O. Heinesen als ikki samdur í, tí sum gongdin er í løtuni, kann roknast við, at prístalið fer niður. Hendan lógin er so eitt plástur á sárið, at prístalið verður avtikið. Men Heini O. Heinesen er bangin um, at lógin um vinningsstøðg als ikki kemur at virka í sama mun sum avtøkan av prístalinum. Hetta er sama lógaruppskotið, sum var í gildi frá september 1981 til 31. december 1983. Í hesum tíðarskeiðið hækkaði prístalið við 48 stigum, og er hetta prógv fyri, at lógin tá ongan sum helst týdning hevði.

Kostnaðarstøðið er meir enn lønin hjá arbiðsmannninum og vinningurin hjá handilsmannninum á horninum. Her er kappingin so hørð í dag, at lóggáva er óneyðug.

Tað, sum serliga hevur gjørt, at kostnaðarstøðið er vorðið so høgt, er fyrst og fremst, at ráðgevingarfeløg og onnur kunnu rokna sær eina procentvísan vinning av tí samlaða prísinum. Út frá hesum viðmerkingum setir Heini O. Heinesen soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at bera sc í bandi, at uppskot um lógarbroytingar verða sett fram, ið kunnu bøta um hesar trupulleikar.

Ein minniluti (Vilhelm Johannesen) vísir á, at hetta uppskot hongur saman við einum øðrum uppskoti frá landsstýrinum, sum er fráboðað nú í longri tíð. Minnilutin hugsar um fráboðaða uppskotið um avtøku av prístalsviðgerðini av lønum.

Løgtingsmál nr. 6 er dagfest 5. december 1989. Áðrenn hetta var tað eisini fráboðað í fleiri mánaðar. Hetta heldur minnilutin vera eina sera løgna mannagongd í tílíkum máli sum hesum. Um ætlanin var, at lógin skuldi virka, áttu landsstýrið og samgongan at gingið stillisliga um hurðarnar.

Fráboðanín um vinningssteðg á sumri og heysti 1989 og so tann langa tíðin frá framløgudegnum, til lógin umsíður kemur at "virka", hevur givið øllum, sum annaðhvørt selja vørur ella tænastur, rúma tíð til at hækka vinningin, áðrenn lógin um vinningssteðg kemur í gildi.

Um ætlanin var, at lógin skuldi virka, so átti prísefti rlitið at kanna allar prísir og vinningar, áðrenn lógaruppskotið varð fráboðað, framlagt og samtykt. Sama kanning átti so at verið gjørd aftaná, at lógin var komin í gildi, og sum nevnt skuldu landsstýrið og samgongan gingið stillisliga um hurðarnar í hesum tíðarskeiði.

Men hendan framferðarhátt valdu teir ikki. Tvørturímóti skuldu tey, sum áseta sín egna vinning, ávarast í góðari tíð.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur landsstýrið, at vinningssteðgur er møguligur at umsita, og at henda skipan varð roynd frá 1981 til 1984. Men hvørki løgtingsins

skattanevnd ella løgtingið hava fingið nakað prógv fyri, at lógin um vinningsstoðg, sum var galdandi frá 1981 til 1984, virkaði eftir ætlan.

Tá landsstýrið og samgongan avtaka dýrtíðarviðgerðina av lønum er ongin bøn. Avtøkan virkar beinanvegin. Hetta fær fulla effekt frá fyrsta degi. Her eru tað allir landsins løntakarar, sum koma at kenna sviðan. Tað sama tykist bara ikki galdandi fyrí øll.

Út frá hesum setir minnilutin onki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Niels Pauli Danielsen) tekur undir við uppskotinum um vinningsstoð við teim broytingum, meirílutin skjýtur upp, men ynskir at taka brúkarafeløgini nógv meira við í eftiransingararbeiði. Landsstýrið eigur heldur at stuðla tílíkum feløgum enn leggja fleiri uppgávur til prísráðið at umsita.

Tí setir minnilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins.

Í § 2, 1. og 2. stk., § 3 og § 4, 2. stk. verður í staðin fyri orðið "Prísráðið" sett: "Landsstýrið".	I § 2, stk. 1 og 2, § 3 og § 4, stk. 2 indsættes i stedet for ordet "Prisrådet": "Landsstyret".

ÍDNAÐARNEVNDIN, 20. februar 1990.

Edmund Joensen Heini O. Heinesen John Petersen

Vilhelm Johannesen Niels Pauli Danielsen

U P P Í S K O Y T I S Á L I T

til

løgtingsmál nr. 6/89: Løgtingslóg um vinningssteðg.

Endamálið við fyriliggjandi lógaruppskoti er at lækka um kostnaðarstøði í okkara samfelag.

Slík lóggáva hevur verið roynd áður við sera vánaligum úrsliti, tí hon ikki hevur umfatað tað mest grundleggjandi, ið átti at funnist í slíkari lóg.

Tá talan er um handil, er tað ikki heilt órímiligt at rokna sær prosentvísan vinning. Tá talan er um ráðgeving, eftirlit og arbeiði, gjørt eftir rokning, har ein sjálvur er við til at ávirka, hvat gerast skal, er skipanin við prosentvísum vinningi tað besta amboð til at økja um okkara kostnaðarstøði, tí teir sum ráðgeva, hava sjálvandi áhuga í at fáa so nógvan vinning sum møguligt.

Hetta gerst við at økja um eina iløgu, sum í flestu førum frammanundan er ov stór.

Annars verður víst til viðmerkingarnar hjá minnilutanum (Heina O. Heinesen) á bls. 2 í álitinum til 2. viðgerð.

Løgtingið hevur í flestu førum ásannað, at so gott sum øll arbeiði gerast í millum ein triðing og helvt dýrari enn av fyrstan tið mett, og merkir hetta, at vánalig ráðgeving verður premierað. Hetta átti at verið beint tvørturímóti.

Út frá omanfyri standandi viðmerkingum setir Heini O. Heinesen soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at leggja fyri tingið lógaruppskot, ið broytir omanfyri umrøddu grundleggjandi viðurskifti, soleiðis at aðrar reglur koma at ávirka kostnaðarstøðið heldur enn prosentvísi vinningurin.

Á FØROYA LØGTINGI, 21. mars 1990.

Heini O. Heinesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

3. nóv. 1989

F. L. j. nr. 1509-3-5-2-2

Tlf. 11080 . Telex 81310 tinorm fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Skrivstovutíð: Kl. 10—15. leygardag stongt

AMF/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 7/1989: Løgtingslóg um stuðul í sambandi við avtøku av furunkulosusmittaðum smolti.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um stuðul í sambandi við avtøku av furunkulosusmittaðum smolti.	lagtingslov om tilskud i forbindelse med aflivning af furunkulosesmittet smolt.
§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at nýta 75% av 7.649.060 kr. til stuðul til teir alarar, ið ikki kundu keypa smolt orsakað av sjúkuni furunkulosu og at leggja peningin úr landskassanum.	§ 1 Landsstyret bemyndiges til at bruge op til 75% af 7.649.060 kr. til tilskud til de opdrættere, der ikke kunne købe smolt på grund af sygdommen furunkulose og at disponere over beløbet af landskassens midler.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Hetta mál varð framlagt í undanfarnu tingsetu sum løgtingsmál nr. 113, dagfest 24. mai 1988.

Í sambandi við avtøku av furunkulosusmittaðum smolti varð gjørd ein semja við alarar (samanber løgtingsmál nr. 107/1986).

Pkt. 2 í semjuni áleggur landsstýrinum at leggja uppskot um ein trygdargrunn fyri løgtingið. Hesin trygdargrunnur, sum umframt annað skuldi nýtast til, at alarar, sum ikki fingu smolt orsakað av furunkulosu, fingu ávist endurgjald.

Endurgjaldið var í tveimum.

1. Smoltstøðir, har smoltið varð avlívað.
   Hetta varð viðgjørt við serligari lóg og í einari serligari nevnd, sum arbeiðir á sama hátt sum húsdjóranevndin.

2. Endurgjald til teir sjógvalarar, sum ikki fingu smolt.
   Hetta hevur ikki nakra lógarheimild ella nakað fyridømi í samband við neyðslakting av djórum sambært húsdjóralógini, men í semjuni bant landsstýrið seg til at tryggja hesum alarum ávist endurgjald.
   Hetta skuldi gerast í einum trygdargrunni, har alararnir skuldu gjalda sín part og landsstýrið sín.
   Løgtingið tók uppskotið um trygdargrunn burtur úr lógaruppskotinum og lat standa eftir bert ein endurgjaldsgrunn, sum skal nýtast til endurgjald, har neyðslaktið fer fram.

Sostatt er eingin lógarheimild komin um at endurjalda sjógvalarum, sum ikki fingu smolt.

Á fundi 28. mars við umboð fyri alarar, umboð fyri Havbúnaðarfelagið og umsitingina hjá Føroya Landsstýri í alimálum varð avgjørt sambært løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987, um sjúkur hjá fiski, skeljadjórum og krabbadjórum at seta niðanfyri standandi metingarnevnd. Jógvan Joensen, Marius Thomasen, Jákup Sverra Joensen. Nevndin var liðug við arbeiði sítt 2. apríl og kom fram til eitt samlað endurgjald uppá 13.215.169 kr.
Sambært løgtingsmáli nr. 152/1987 varð samtykt at veita alarunum upp til 6 mió. kr. í stuðuli av upphæddini.

Alararnir vóru ikki nøgdir og mettu at hendan upphædd-
in ikki kundi hjálpa teimum úr kreppustøðuni, sostatt
verður skotið upp, at løgtingið heimilar landsstýrinum at
nýta 75% av 7.649.060 kr. til teir alarar, ið mistu smolt
orsakað av sjúkuni furunkulosu.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/
/

Kjartan Hoydal

Álit

í

løgtingsmáli nr. 7/1989: Løgtingslóg um stuðul í sambandi við avtøku av furunkulosusmittaðum smolti.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 3. oktober 1989 og eftir 1. viðgerð 5. oktober beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jógvan Durhuus, Flemming Mikkelsen og Eilif Samuelsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Tordur Niclasen førir fram:

Málið snýr seg um uppaftursøku av tingmáli nr. 113/1988, sum var framlagt av landsstýrinum tann 27. mai 1989, og eftir 1. viðgerð 29. mai beint í fíggjarnevndina.

Tann 30. mai legði fíggjarnevndin fram álit, har ein samd nevnd mælir Føroya Løgtingi til at samtykkja uppskot landsstýrisins. Undir 2. viðgerð var málið beint aftur í fíggjarnevndina og kom ikki fram aftur í tí tingsetuni og fall sostatt burtur. Upprunin til fyriliggjandi mál er lýst í brævaskifti ímillum alararnar og Føroya landsstýri og ímillum Føroya landsstýri og fíggjarnevndina. Sum tað framgongur av hesum, hevur Føroya landsstýri samtykt at veita alarunum beinleiðis endurgjald og partvíst endurgjald sum kreppulán, men fíggjarnevndin vildi ikki viðgera kreppulánsumsóknirnar undir einum. Alararnir skuldu tí søkja um kreppulán hvør í sínum lagi. Men áðrenn viðgerðir av hesum umsóknunum vóru liðugt viðgjørdar í landsstýrinum, var kreppulánslógin farin úr gildi tann 31. december 1988 og ikki endurnýggjað. Nýggja landsstýrið samtykti tí tann 22. apríl 1989 at veita 75% av 7.648.460 í endurgjaldi til sjógvalararnar við útgangsstøði í givnum lyftum frá Føroya landsstýri og bað um fíggjarnevndarinnar heimild til hetta, men nevndin helt seg ikki hava hesa heimild, og tí var málið lagt fyri Føroya Løgting 27. mai 1989. Út frá tí, sum fram er farið í hesum máli, heldur minnilutin, at Føroya

landsstýri hevur bundið landskassan við avtalu við alararnar, uttan at neyðugar heimildir hava verið til staðar. Tá so kreppulánsheimildin eisini er avtikin, áðrenn málið tann vegin var komið til avgreiðslu, eru eingir møguleikar, um landsstýrið skal kunna standa við givin lyfti, uttan at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Út frá hesum umstøðum mælir minnilutin (Anfinn Kallsberg og Tordur Niclasen) til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Eitt annar minniluti (Jørgen Thomsen) tekur støðu í tingsalinum.

FÍGGJARNEVNDIN, 21. mai 1990.

Anfinn Kallsberg | Flemming Mikkelsen | Jógvan Durhuus

Eilif Samuelsen | Heine O. Heinesen | Tordur Niclasen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TF. 11030 . Telex 81310 tinghs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. leygardag stongt

22. august 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari)

AP/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 8/1989: Broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 38 frá 20. mai 1988 um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Til fulla ella partvísa endurrinding av serligu innflutningsgjaldinum av tilfari til bygging av dekksfiskifari í Føroyum

lagtingslov om ændring i lagtingslov om støtte til bygning af fiskeskibe på færøske skibsværfter til eksport.

§ 1.

I lagtingslov nr. 38 af 20. maj 1988 om støtte til bygning af fiskeskibe på færøske skibsværfter til eksport foretages følgende ændringer:

1) § 5, stk. 1 affattes således:
"Til fuld eller delvis dækning af den særlige indførselsafgift på materiale til bygning af dæksfiskeskib på Færøer-

kann skipasmiðjan fáa í studningi upp til 13% av virði skipsins eftir meting."

2) § 6, stk. 2 verður strikað.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

ne, kan skibsværftet få et tilskud på op til 13% af skibets værdi efter vurdering."

2) § 6, stk. 2 udgår.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Byrjað varð at byggja stálskip í Føroyum í 60-unum og um hetta sama mundið varð innflutningsgjald lagt á allar vørur.

Hetta gjald, sum skipasmiðurnar eisini skuldu gjalda, fingu tær afturgoldið við at skjalprógva útreiðslurnar í sambond við nýbygningar.

Henda skipan helt fram í nøkur ár, men varð so torfor at umsita bæði fyri umsitingina og skipasmiðjurnar, at hon varð broytt til at skipasmiðjurnar fingu útgoldið sama prosenttal sum innflutningsgjaldið var roknað av metingarvirði skipsins, tá ið tað var liðugt.

Endurrindingin var eftir løgtingslóg nr. 24 frá 1. juni 1978 við seinni broytingum 16%.

Við løgtingslóg nr. 102 frá 19. august 1988 varð lógin aftur broytt til tað upprunaliga, harav studningurin fyri serliga innflutningsgjaldið varð goldin eftir váttan frá gjaldstovuni.

Uppskotið frá landsstýrinum er gjørt eftir áheitan frá skipasmiðjunum. Skipasmiðjurnar vísa á, at umsitingin av nýggju skipanini er ógvuliga torfør.

Eftir broytingini fáa skipasmiðjurnar upp til 15% endurgoldið í mun til 16% eftir lóg nr. 24 frá 1. juni 1978.

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður

/
/ Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 8/1989: Broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 19. september 1989 og eftir 1. viðgerð 21. september beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

FÍGGJARNEVNDIN, 22. september 1989.

Anfinn Kallsberg Heini O. Heinesen Jógvan Durhuus

Flemming Mikkelsen Eilif Samuelsen Jørgen Thomsen

Tordur Niclasen

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 9/1989: Broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á førovskum skipasmiðjum til útflutnings.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 19. september 1989 og eftir 1. viðgerð 21. september beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Í skrivi dagf. 29. september 1989 hevur menningarstovan mælt til at uppskotna broytingin av § 5, stk. 1 í løgtingslóg nr. 38 frá 20. mai 1988 verður víðkað til eisini at galda fyri plasttrevjabátar.

Figgjarnevndin er samd um at taka undir við tilmælinum frá menningarstovuni og mælir til soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, 1) í uppskoti landsstýrisins. Sum 2. punktum verður sett:
"Landsstýrinum verður heimilað at seta í gildi samsvarandi endurrindingarskipan fyri onnur før og bátar, bygd í Føroyum."

I § 1, 1) i landsstyrets forslag. Som 2. punktum tilføjes:
"Landsstyret bemyndiges til at sætte i kraft tilsvarende refusionsordning for andre fartøjer og både, bygget på Færøerne."

FÍGGJARNEVNDIN, 31. oktober 1989.

Anfinn Kallsberg — Heini O. Heinesen — Jógvan Durhuus

Flemming Mikkelsen — Eilif Samuelsen — Jørgen Thomsen

Tordur Niclasen

Á l i t II

í

løgtingsmáli nr. 8/1989: Broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.

Málið er eftir aðru viðgerð tann 10. november beint aftur í figgjarnevndina. Orsøkin til hetta var, at ivi tók seg upp, um tann tilmælta broytingin hjá figgjarnevndini ávirkaði lóggávuna um bygging av farmaskipum.

Fyri at eingin ivi skal taka seg upp, setir ein samd figgjarnevnd í staðin fyri uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskari skipasmiðju til útflutnings.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om støtte til bygning af fiskeskibe på færøske skibsværfter til eksport.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 38 frá 20. mai 1988 um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings verður gjørd hendа broyting:	I lagtingslov nr. 38 af 20. maj 1988 om støtte til bygning af fiskeskibe på færøske skibsværfter til eksport foretages følgende ændring:
§ 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:	§ 5, stk. 1 affattes således:
"Til fulla ella partvísa	"Til fuld eller delvis

endurrinding av serliga innflutningsgjaldinum av tilfari til bygging av deksfiskifari í Føroyum kann skipasmiðjan fáa í stuðningi upp til 13% av virði skipsins eftir meting. Landsstýrinum verður heimilað at seta í gildi samsvarandi endurrindingarskipan fyri onnur fiskifør, bygd í Føroyum."

dækning af den særlige indførselsafgift på materiale til bygning af dæksfiskeskib på Færøerne, kan skibsværftet få et tilskud på op til 13% af skibets værdi efter vurdering. Landsstyret bemyndiges til at sætte i kraft tilsvarende refusionsordning for andre fiskefartøjer, bygget på Færøerne."

FÍGGJARNEVNDIN, 21. februar 1990.

Anfinn Kallsberg Heini O. Heinesen Jógvan Durhuus

Flemming Mikkelsen Eilif Samuelsen Jørgen Thomsen

Tordur Niclasen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

Tlf. 11080. Telex 81310 lings fa. Telefax 14942. Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

22. august 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari)

AP/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 9/1989: Broyting í løgtingslóg um endurnýggjing av fiskiskipaflotanum.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurnýggjing av fiskiskipaflotanum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 102 frá 19. august 1988 um endurnýggjing av fiskiskipaflotanum verður gjørd henda broyting:

1) § 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Til fulla ella partvísa endurrinding av serligu innflutningsgjaldinum av tilfari til bygging av

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fornyelse af fiskeflåden.

§ 1.

I lagtingslov nr. 102 af 19. august 1988 om fornyelse af fiskeflåden foretages følgende ændring:

1) § 5, stk. 1 affattes således:
"Til fuld eller delvis dækning af den særlige indførselsafgift på materiale til bygning af dæksfiskeskib på Færøer-

dekksfiskifari í Føroyum kann skipasmiðjan fáa í studningi upp til 13% av virði skipsins eftir meting."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

ne, kan skibsværftet få et tilskud på op til 13% af skibets værdi efter vurdering."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Víst verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 8/1989: Broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður

/

/ Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 9/1989: Broyting í løgtingslóg um endurnýggjing av fiskiskipaflotanum.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 19. september 1989 og eftir 1. viðgerð 21. september beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir eina samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

FÍGGJARNEVNDIN, 22. september 1989.

Anfinn Kallsberg Heini O. Heinesen Jógvan Durhuus

Flemming Mikkelsen Eilif Samuelsen Jørgen Thomsen

Tordur Niclasen

Uppskot til
Fíggjarløgtingslóg
árið 1. januar - 31. december 1990

Forslag til
Finanslagtingslov
året 1. januar - 31. december 1990

			Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§	1.	Skattir Skatter	1.190.000.000	
§	2.	Toll- og framleiðslugjøld Told- og fremstillingsafgifter	1.108.000.000	
§	3.	Onnur gjøld Andre afgifter	16.430.000	
§	4.	Inntøkur av spæli Indtægter ved spil	600.000	
§	5.	Rentur og vinningsbýti v.m. Renter og udbytte m.v.		42.000.000
§	6.	Landsstovnar Landsvirksomheder		25.737.000
§	7.	Partur av avlopi danska tjóðarbankans Andel i den danske Nationalbanks overskud	20.000.000	
§	8.	Gjøld frá danska statinum Betalinger fra den danske stat	776.713.000	
§	9.	Ymsar inntøkur Diverse indtægter	5.000	
				67.737.000
		Nettoinntøka/Nettoindtægt		3.044.011.000
			3.111.748.000	3.111.748.000

		Útreiðslur Udgifter kr.
§ 10.	Løgtingið Lagtinget	16.063.000
§ 11.	Landsumsitingin Landsadministrationen	160.671.000
§ 12.	Heilsumál Sundhedsvæsenet	354.045.000
§ 13	Samferðslumál Kommunikationsvæsen	269.800.000
§ 14.	Skúlamál Undervisningsvæsen	293.168.000
§ 15.	Vísindi, bókmentir og list Videnskab, litteratur og kunst	97.214.000
§ 16.	Fiskivinna, sigling o.t. Fiskeri, søfart o.l.	555.839.000
§ 17.	Landbúnaður og matrikulering Landbrug og matrikulering	46.627.000
§ 18.	Handil, íðnaður v.m. Handel, industri m.v.	44.584.000
§ 19.	Almenn forsorg Socialvæsen	819.256.000
§ 20.	Pensjónsútreiðslur Pensionsudgifter	8.455.000
§ 21.	Effektivar veðhaldsbindingar Effektive garantiforpligtelser	80.000.000
§ 22.	Aðrar og óvissar útreiðslur Andre og uvisse udgifter	5.835.000
§ 23.	At leggja í ymsar grunnar v.m. Henlæggelser til forskellige fonds m.v.	149.063.000
§ 24.	Avdráttir av lánum Afdrag på lån	4.000.000
§ 25.	Avskrivingar Afskrivninger	38.433.000
§ 26.	Ymsar ognarútreiðslur Diverse ejendomsudgifter	700.000
§ 27.	Reguleringskonto Reguleringskonto	0
	Tilsamans/Ialt	3.043.753.000
	Meirinntøka/Merindtægt	258.000
		3.044.011.000

Yvirlit yvir flytingar á ognar- og kapitalkonti
Oversigt over bevægelser pa formue- og kapitalkonti

		Brutto inntøka indtægt kr. (1.000)	Brutto útreiðsla udgift kr. (1.000)	Netto inntøka indtægt kr. (1.000)	Netto útreiðsla udgift kr. (1.000)
§ 30.	Kassakonto Kassekonto	486.809		486.809	
§ 31.	Virðisbrøv Værdipapirer		750		750
§ 32.	Útlán Udlån	9.575	7.000	2.575	
§ 33.	Inntøkueftirstøður Indtægtsrestancer		52.050		52.050
§ 34.	Aktiv hjá grunnum Aktiver tilhørende fonds	425.963	559.100		133.137
§ 35.	Aktiv hjá deponentum Aktiver tilhørende deponenter		80.000		80.000
§ 36.	Millumrokningar til góðar Mellemregning til gode	102.408	163.325		60.917
§ 37.	Fastar ognir og anlegg Fast ejendom og anlæg	40.750	2.000	38.750	
§ 38.	Skip Skibe	16.500		16.500	
§ 39.	Millumrokning við nýtt fíggjarár Mellemregning med nyt finansår	150.000	350.000		200.000
§ 40.	Millumrokning, skuld Mellemregning, gæld	1.000		1.000	
§ 41.	Lán Lån		172.000		172.000
§ 42.	Deposita Deposita	15.000		15.000	
§ 43.	Grunnar Fonds	563.000	429.863	133.137	
§ 44.	Burturlegg. og avskrivingar Henlæggelser og afskrivninger	4.000	39.000		35.000
§ 45.	Kapitalkonto Kapitalkonto	40.083		40.083	
		1.855.088	1.855.088	733.854	733.854

INNTØKUR:
INDTÆGTER:

Landskassans inntøkur í fíggjarárinum 1989 verða mettar sum tilskilað í §§ 1-9.
I finansåret 1989 beregnes landskassens indtægter som anslået i §§ 1-9.

		Roknskapur 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)	Játtan 1990 kr. (1.000)
§ 1	**Skattir** **Skatter**			
1201	Vanligur landsskattur Sædvanlig landsskat	1.084.351	1.250.000	1.130.000
1507	Sjómansskattur Sømandsskat	17.748	0	0
1702	Rentuskattur Renteskat	28.532	30.000	30.000
1804	Vegskattur Vejskat	30.545	30.000	30.000
		1.161.176	1.310.000	1.190.000
§ 2	**Toll- og framleiðslugjøld:** **Told- og fremstillingsafgifter, registreringsafgifter:**			
2017	Tollgjøld Toldafgifter	820.543	850.000	860.000
2041	Brennioljugjald Brændselsolieafgift	108.388	105.000	105.000
2708	Framleiðslugjøld Fremstillingsafgifter	29.761	30.000	35.000
2713	Skrásetingargjald Registreringsafgifter			
23615	Virðis- og vektargjald Værdi- og vægtafgift	119.448	120.000	105.000
33014	Umskrásetingargjald Afgift for omregistrering	2.489	3.000	3.000
		1.080.629	1.108.000	1.108.000
§ 3	**Onnur gjøld** **Andre afgifter**			
3052	Gjøld fyri spiritusskamtanarkort Afgifter for spiritusrationeringskort	282	200	220
Løgið kortini, tá hugsað verður um, at vit nú bæði hava búskaparmálaráðharra og fíggjarmálaráðharra og ein løgmann, sum hevur grannskoðað hvønn fíggjarlógarkrók og hvørt fíggjarskot í meira enn 20 ár. Ein skuldi tí hildið, at júst í ár var lagamanni at fingið greitt uppsett og einfalt tilfar til hetta týdningarmikla lógarsmíð.

Skeivu samfelagsgongdina kunnu vit kortini øll meta um uttan serligar lýsingar úr landsstýrinum ella í fylgiskjølum hagani. Hendan stendur hvørjum borgara skelkandi greið. Eins greitt stendur hvørjum føroyingi, at frá verandi stýri eru ikki tiltøk væntandi, sum koma at benda gongdini aftur á beint.

Ferð eftir ferð hevur áðurnevndi løgmaður sagt frá, at landsstýrið - um fáar dagar - um heilt stutta tíð - fyrst í næstu viku - ella í hesum mánaðinum fór at geva boð upp á loysnir viðvíkjandi ymsum samfelagsmálum. Men tað, sum hendi hvørja ferð, var at onkur samgongumaður úr øðrum flokki beinanvegin avsannaði, at loysnir vóru í eygsjón so tíðliga, sum løgmaður fróður hevði boðað frá, og hesar eru tí heldur ikki komnar, snøgt sagt ikki ein, hóast dúgliga hevur verið reypað, eitt nú á tíðindafundum í Føroyum og í útlondum.

Serliga á fiskivinnuøkinum er trupult hjá andstøðuni at meta um fíggjarlógaruppháddina, tá samgongan dylir sum mansmorð, tey tiltøk, teir tala so nógv um at fremja, men ikki semjast um. Fíggjarlóg má smíðast eftir teimum fortreytum, ið valda, men hvørki løgting, fiskimenn, reiðarar, bankar ella flakavirkisleiðarar hava snevil av, hvønn veg samgongan ætlar at snara hesar fortreytir. Tilmæli minnilutans verða tí út frá teimi broytingum í fiskivinnustrukturi, veiðumynstri, framleiðslu - og sølumynstri, sum Javnaðarflokkurin metir avgjørt neyðugt at fremja.

Sama er galdandi viðvíkjandi øðrum greinum. Men eisini her er munur á hugsan Javnaðarfloksins um, hvussu langt tað ber til at pína niður tænastuveitingarnar til hesar skattaplágaðu løntakarar, pensionistar og tey í útbúgving, og hugsan samgongunnar.

Minnilutin fer fyri hvørja grein sær at lýsa hendan lyndismun og mun í politiskari hugsan, men skal kortini gera enn nakrar generellar viðmerkingar til ta støðu, sum samgongan longu hevur sett land og fólk okkara í, og lýsa ótta okkara fyri avleiðingunum av, at eitt slíkt stýri møguliga kemur at virka í trý ár aftrat. Tað er týðuliga komið til sjóndar, at sokallaði fíggjarpolitikkur samgongunnar ikki hevur borið bata í sær- tvørturímóti.

Fyriliggjandi uppskot meirilutans sýnir, at samgongan ætlar at halda fram við sínum Tatcher/Schlüter-politikki. Tí kann Javnaðarflokkurin ikki taka undir við, og tekur tí heldur ikki undir við fíggjarlógaruppskoti meirilutans.

Tatcher/Shlüter-politikkurin er fullkomuliga miseydnaður í Bretlandi og Danmørk, og tí ávaraði Javnaðarflokkurin fyrst undir viðgerðini av fíggjarlógaruppskotinum fyri 1989 og aftur undir viðgerðini av hesum uppskoti til fíggjarlóg fyri 1990 ímóti at royna slíkan politikk í Føroyum.

Vit royndu at vísa á, at tann politikkurin, saman við teimum ógvuliga bonsku inntøkulógunum og tí illa umhugsaða búskapartiltakinum, sum tvungna samansparingin var, fór at føra við sær, at inntøkugrundarlagið hjá landskassanum ruddi burtur. Hetta sæst best av teimum tølum, sum meirilutin leggur á borðið í dag. Samgongan var so ógvuslig at krevja pening inn og skerja almenna virksemið, at myndin bóltaði rút.

Tað, samgongan róptí inntøkulógir til landskassan, gav honum als ongar inntøkur, men eitt stórt hall,- bæði í 1989 og 1990, og hetta hóast tað nærum alt árið 1989 hevur verið møguligt at bóka nýtslu inn á yvirskotið, sum annars vildi verið í 1988. At bóka nýtslu í 1990 inn á hallið í 1989 fer so ikki at pynta nakran landskassarokningskap hesi bæði árini.

Løgmaður nevndi í ólavsøkurøðuni, at ovurvirksemi hevði verið í 1988 og undarfarin ár, men at samgongan fór at ansa eftir, at hetta ikki broyttist til arbeiðsloysi. Hetta megnaði hon tó ikki, tí eingin er í iva um, at túsundtals fólk í dag eru arbeiðsleys ella hava fingið skert arbeiðsmøguleikar sínar so nógv, at tey ikki greiða sínar skyldur.

Nøkur hundrað vil samgongan broyta hetta tal til út frá talinum yvir slík, ið fáa almannaveiting sum arbeiðsleys, men hon gloymir tá tey mongu, sum longu eru flutt úr landi okkara til Svøríkis, Danmarkar (Hirtshals), Grønlands, Canada og onnur lond at arbeiða. Hesi eru so eisini vorðin arbeiðsleys í Føroyum , sama teir mongu útlendingar, samgongan heldur, vit kunna vísa burtur.

Í skjótt farna ári hava vit upplivað tað, ið ikki er hent seinastu 29 árini, nevniliga, at einki nýtt skip er í gerð í Føroyum, og frá landsstýrinum verður ikki rætt hond frá síðu fyri at bøta um hetta. Skulu vit framyvir eiga fólk, sum duga at røkja okkara fiski- og farmaflota, fer hetta ikki at bera til. Hvønn, skulu vit seta við - lærlingar, verkfrøðingar, teknarar og konstruktørar - um einki skipasmíð skal vera?

Væl hava vit ov stóra orku til heimaleiðirnar, men skulu hesar bert røkjast av eldri og illa røktum skipum, er deyðin skjótt í durðunum. Ein ávís - fyriskipað - endurnýggjan má alla tíðina fara fram, og tørvurin á hesi er ikki minni enn samlaða skipabyggiorka Føroya.

Hesin spurningur er eisini tengdur at møguleikanum fyri at fremja neyðuga strukturbroyting í føroyskari fiskivinnu, har m.a. góðskukrøvini koma at treyta, at vit fáa rætta prísin fyri okkara ediliga ávørutilfeingi.

Í tí viðkvæma spurningi fiskivinnan er í okkara samfelag stendur øllum greitt, at hon ber seg ikki, og at trýstið á grunnarnar er ov hart.

Eyðvitað er, at tað er neyðugt at sleppa undan at lata hundraðtals miljónir í studningi til hendan ov stóra og elda flota. Vit mugu tí hugsa í góðsku og ikki í nøgd og hugsa um framleiðslu og sølu, sum geva nógv meira - ja dupult so nógv fyri at nýta orð fiskasølustjórans - skulu vit sleppa úr hesi studningskarusell, sum einki gevur fiskimonnum ella flakafólki, men bert skoytir tað uppí, sum fyriskiparamir og leiðaramir (managers) og sølufólk ikki megna at fáa til vega. Endurnýgging og endurboting av flotanum skal tí framvegis geva møguleikar fyri tílíkari hagreiðing umborð, at vit bert virka fyrsta floks vøru framyvir.

Við hundraðtals studningsmiljónum í huga er ikki noktandi, at vit kortini eru komin í eina arbeiðsloysisstøðu, har samfelagið einki fær fyri pening, ið latin verður, og har fólk, sum høvdu góða inntøku, eru flutt av landinum, so bæði landskassi og kommunur missa pening. Hetta hava vit ikki kent síðani fyrst í 60-unum.

Javnaðarflokkurin heldur, at arbeiðsloysistrygd skal vera teimum tøk, ið einki arbeiði kunnu fáa, men álit má hetta ongantíð gerast hjá stórum tali av fólki, og flokkurin skjýtur tí upp í hesi fíggjarlóg, at seta pening av til arbeiði ymsastaðni í landinum, sum nú liggja á láni, so hesi fyribyrgja arbeiðsloysi, og vit koma í hóskandi javnvág aftur.

Harumframt stendur gerð av undirsjóvarholi millum Vágar og Streymoy meira "neutralt" í búskapinum enn onnur almenn íløguarbeiði, serliga í eini tíð við arbeiðsloysi. Flokkurin skjýtur tí upp, at taka hetta arbeiðið uppaftur í 1990.

Vit vilja tí leggja fram eina meira framtakskenda fíggjarlóg enn hana, samgongan mælir til. Hon skal seta gongd í á ávísum økjum, men tálma á øðrum, vísa nýggjar leiðir í inntøkupolitikki, men ikki virka eftir teimum veruleikum og fortreytum, sum samgongan hevur skapt. Hetta, tí eingin ivi er um, at privatu íløgurnar verða bert lítil partur av tí, sum verið hevur.

Greinirnar 1 -9 Inntøkur

Inntøkusíðan á eini fíggjarlóg er kin týdningarmesta, tí hon gevur møguleikarnar fyri at veita tænastu ella fremja útbygging.

Samgongan, ið als ikki dugdi at nýta bremsuskipanina á føroyska akkfarinum, steðgaði hesum so harðliga, at førningurin leyp framav og nú liggur sorlaður á farvegnum. Hetta hóast javnaðarflokkurin ávarað og vísti á, at ein stigvís tálming var farin fram í 1988, soleiðis at vit í 1989 vildu komið í hóskandi javnvág. Hetta vátta projekterings- og byggifeløg í dag.

Tí var landsstýrisskiftið í juni tann stóra politiska vanlukkan, tí hetta gav møguleika fyri sambandsins kensluleysa og fyrilitarleysa "búskapareksperimenti", sum í forhond var dømt at miseydnast.

Í hesi støðu samgongan hevur ført okkum út í, spyr hon ákærandi andstøðuna, hvussu hendan vil útvega meira pening.

Svar okkara - at hetta ikki skal gerast uppá samgongunnar "præmissir" - men at her velst um, hvønn heildarpolitikk tú vilt reka, verður als ikki góðtikið. Tú skalt bert taka ábyrgd av at flyta enn meira pening frá vanligum fólki til at typpa holini í eini ónýtiligari borgarligari búskaparskipan.

Javnaðarflokkurin ásannar tí, at ongin nytta er í at leita eftir peningi til framhald av tí visnipolitikki, meirilutauppskotið til fíggjarlóg er prógv um.

Javnaðarflokkurin ásannar eisini at við hesum politikki ber ikki til at meta inntøkurnar í 1990 hægri enn meirilutin hevur gjørt. Helst verða bæði skatta- og tollinntøkur enn lægri.

Goymslurnar tømast sjálvsagt spakuliga, men vinnurekandi verða varin við at taka vørur heim, tí borgarin torir neyvan liva. At hetta er nýtslutemjandi skal sannast, men máti skal vera við.

Neyðugt er tí at ganga nýggjar leiðir í inntøkupolitikki.

Veikleikarnar í okkara skattaskipan hevur Javnaðarflokkurkn so ofta víst á. Ikki minst tann veruleika, at veikar sálir - serliga síðan vit fingu serkønar skattaráðgevarar - altíð vilja misnýta tær skipanir, ið skuldu vera til gagns fyri fjøldina.

Hetta er borgarligur politikkur - høgrapolitikkur - sum byggir á hugmynd um, at nøkur skulu hava so leysar teymar, at tey skulu kunna gerast samfelagsslóðarar.

Ein misnýtsla, ið harðliga hevur vundið upp á seg seinastu 8 árini, er spekulasjón í at læna pening til "uppsparing" , har læntur peningur verður settur inn á bók.

Hetta ger, at tey, sum verulíga treingja til rentufrádrátt fyri at kunna seta búgv, missa henda fyrimun, tí neyðugt er at brandskatta restinntøkuna, so rentuspekulantarnir kunnu koyra hesar hundraðtals miljónir í lumman.

Renturnar av 3-5 milliardum krónum eru bæði frádráttarrentur og "uppsparingsrentur", og geva soleiðis skattafríðan rentuvinning, sum kostar landskassanum 3-400 milliónur krónur. Javnaðarflokkurin setur í hesum fíggjarlógaruppskoti fram ynski um broyting í skipanini, so møguleikin í dupultspekulasjón við rentum fellur burtur.

Hetta kann sjálvsagt ikki verða framt uttan fult endurgjald til teirra, sum veruliga dragast við rentubyrðuna av tungum sethúsalánum. Helst verður eisini neyðugt at gera yvirgangsskipanir fyri aðrar rentur, sum ikki beinleiðis hava samband við búseting, men stava frá fíggjarviðurskiftum, húski hava grundað seg á, eitt nú við keypi av innbúgvi, húsarhaldstólum, bili ella báti.

Eftir fáum árum vil henda skattalógarbroyting minka uttanlandaskuldina við 2-3 milliardum krónum og geva landskassanum einar 3-400 miljónir kr. í meirinntøkum.

Torført er at meta um, hvat ein lagalig og stigvís broyting fyri privatpersónar kann geva fyrsta árið, men leggjast má so til rættis, at hon í 1990 gevur einar 20 milj. kr. í landskassan.

Stórur partur av útlánunum í peningastovnunum hevur landskassaveðhald aftanfyri . Í Danmark , har bankarnir stórt sæð hava alla ábyrgdina av vinnulívsfígging og nærum einki statsveðhald, er loyvda skattliga avsetingin at standa móti tapi 3% av útlánunum. Fyri mánaða síðani loyvdi landsstýrið í reglugerð bankunum avseting upp á 11% ella einar 720 milj. kr. skattafrítt.

Broyting til t.d. 6% kundi givið landskassanum einar kr. 165 milj. í meirinntøku fyrsta árið. Tá bankarnir óivað nú fara at missa nakað av peningi í ár, og tá møguligar broytingar í rentumarginalinum kunnu ávirka støðuna, er tó rætt at miða ímóti, at broytingin í avsetingarprosenti fyrsta árið gevur landskassanum 80 milj. kr. í meirinntøkum.

Uppskotið hjá Sjálvstýrisflokkinum um avmarking í avskrivingarmøguleikunum fyri skrivstovu- og handilsbygningar til 5 og 2% var skilagott. Hesir bygningar eiga stóran part av teirri uttanlandskuld, sum samgongan roynir at flyta frá privatum yvir til landskassan.
Uppskotið eigur at verða uppafturtikið. Javnaðarflokkurin var við til at skapa tænastuvinnuni henda avskrivingarmøguleika, flokkurin hevur tí einki ímóti at fremja broytingar stigvíst, soleiðis at vinningur landskassans í 1990 verður avmarkaður til 15 milj. kr.

Møguleikar vinnulívsins fyri óavmarkaðum rentufrádrátti sum rakstrarútreiðsla, hóast lántøka ikki er neyðug, tí miljónir standa á bók mugu avmarkast, so at mótrokning fer fram áðrenn skatting
Í teimum førum, har innistøðan er í føroyskum peningastovni, meðan lántøkan er úr serligum fíggjarstovni, vil broyting framd við eitt kut raka føroysku peningastovnarnar ov hart hvat likvititeti viðvíkur. Tað má tí vera hóskiligt mál at seta sær, at fáa til vega 40 milj. krónur til landskassan av hesi broyting, hóast Líkningarráðið sigur frá, at longu í 1987, áðrenn spekulasjónin veruliga tók dyk á seg gav landskassin partafeløgunum 95 milj. krónur í skattalætta fyri rentuspekulasjón.

Aftrat hesum koma privat vinnurekandi, sum ikki eru partafeløg og minni inntøkan hjá landskassanum av hesum er ikki minni enn fyri partafeløg. Eisini hagani eiga so einar 40 milj. kr. eyka, at koma í landskassan.

Hesar skattabroytingar geva landskassanum einar 195 milj. krónur í meirinntøku fyrsta árið, svarandi til triðing til helvt av tí, tær skulu geva yvir 4 til 5 ár.

Óskattaða milliard Tjóðveldisflokksins er helst nokk so sannlík. Tí hómar Javnaðarflokkurikn eisini skattalætta til vanliga skattaborgaran frá 1991 og framyvir.

Umframt tvungnu samansparingina upp á 110 milj. krónur, sum í 1989 var ein eykaskattur, ið kemur at kosta skattaborgaranum 250 milj. kr. áðrenn 1992, legði samgongan í summar 156 milj. krónur í tolli og avgjøldum á borgaran.

Sum Javnaðarflokkurin longu tá vísti á, kom hesin peningur ongantíð í kassan - tvørturímóti. Í dag metur samgongan tollinntøkumar fyri 1990 til 805 milj. kr. heldur enn 850 milj kr. + 156 milj. kr. = kr. 1.006 milj. kr., sum er ein munur upp á 201 milj. kr. Fíggjarlógin hjá samgonguni kemur helst ikki at geva landskassanum meira enn 750 milj. kr. í tollinntoku.

1. januar 1990 verður oljuprísurin 1,90 kr. pr.litur og ger hetta, at oljugjaldið verður ikki meira enn 60 - 70 milj. krónur í 1990 mótvegis ætlaðum 105 milj. krónum (108 milj. kr. í 1988).

Hetta er ein minni inntøka upp á 35 - 45 milj. krónur, hartil koma 21 milj. krónur í samband við avtøku av 6% gjaldinum

Framleiðslugjøldini minka helst niður í 25 milj. krónur, sum er ein minniinntøka upp á 5 milj. krónur í mun til 1988 og 10 milj. krónur til ætlan landsstýrisins fyri 1990.

Bilgjøldini, ið vóru 120 milj. krónur í 1988 eru nú av meirilutanum mett til at geva 85 milj. krónur.

Við galdandi toll- skatta og tvangsuppsparingslóggávu og væntaðum falittum í bilhandlaravinnuni, metir Javnaðarflokkurin ikki hesa inntøku hægri enn 65 milj. krónur.

Fíggjarlóg samgongunnar kemur sostatt at geva 100 milj. kr. minni í toll- og øðrum gjøldum enn meirilutin og landsstýrið metnu.

Gongdin í tollinntøkunum má tí vendast.

Javnaðarflokkurin var samdur í at tálmast skuldi í, men soleiðis, at vit framdu hetta skilagott og avvegað.

Tí ávaraðu vit og róptu vit varskó, um at førningurin fór í sor, tá hann rósaði framav av spælinum hjá tí samgonguleiðara, sum ikki hugsar samfelagspolitiskt, men bert vil hava Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin upp at dansa, sum hann vil.

Vit kunnu koma aftur í javnvág, um vit fremja broytingar í illa umhugsaðu búskapartiltøkunum seinasta summar, men tað verður ikki at fáa slíkar samtyktar.

Javnaðarflokkurin ásannar, at hann fær ikki samgonguna at taka tiltøkini aftur til fulnar. Slík krøv vildu verið politiskt ovboðin, men flokkurin vónar kortini, at vit í felag kunnu fremja ein politikk, sum fær hjólini at mala aftur.

Tí seta vit ikki skilabesta uppskotið - nevniliga at avtaka lógina um tvungna uppsparing - fram, men seta ístaðin uppskot um slíkar broytingar í hesi skipan. at borgarin aftur torur at liva.

Lógin um tvungna samansparing eigur at verða broytt so, at inntøkubólkurin 110.000 - 150.000 verður fritikin fyri samansparing. Inntøkubólkarnir 150.000 - 200.000 kr.og omanfyri 200.000 kr. spara saman ávikavist 2 1/2 % og 3 1/2 % í 1990

Samstundis verður frá 1. apríl í 1990 til Arbeiðsmarknaðareftirløn goldið av arbeiðsmarknaðinum 1/2% frá arbeiðsgevara og 1/2% frá løntakara.

Hetta vildi lætt so mikið og fingið so mikið í gongd, at inntøkumetingarnar kundu verið hækkaðar, soleiðis at samgongan fekk ein part av teimum 156 milj. kr., hon legði á í summar.

Handilsvinnan fekk tá eisini eitt sindur rúmari ræsur, tó at hon ikki kom at sita í tí "smørholi", hon sat í í 1987-88.

Javnaðarflokkurin heldur, at um hesar smáu broytingar verða framdar saman við nevndu lítlu hækking í almennum íløguvirksemi, kunnu nendu 100 milj. kr. kortini fáast inn og hartil einar 30 - 40 milj. kr. , tí so mong fleiri fáa inntøku at rinda toll við.

Partarin av avlopi danska Tjóðbankans hevur seinastu mongu árini ligið um 35 - 50 milj. kr. árliga. Tí kann hann helst best uttan ampa setast til 30 milj. kr. í 1990. Verður hetta ikki, hava føroysku fólkatingslimirnir mistikið seg stórliga, tá teir bjargaðu búskaparpolitikki Glistrup/Schlúters fyri jól.

Á inntøkusíðini metir javnaðarflokkurin sostatt, at 240 milj. kr. kunnu táast inn, uttan at vanligi borgarin verður roysttur enn meira .

Inntøkurnar tilsamans verða sostatt 3.188,301 milj. kr..

Grein 11 Landsfyrisitingin

Undir fyrstu viðgerð vísti Javnaðarflokkurin á, at tað er ivasamt um játtaninar til almenna fyrisiting fara at halda, og m.a. varð víst á, at Líkningarráðið ikki fór at verða fært fyri, at røkja allar tær uppgávur, sum verða lagdar til stovnin.

Nú hevur meirilutin í fíggjarnevndini lækkað uppskotnu upphæddirnar við næstan 12 miljónum. Serliga verður tikið frá teimum stóru og rýdningarmikla stovnunum. Játtanin til Landsskrivstovuna verður lækkað við meir enn tveimum miljónum í mun til í ár. Hetta verður gjørt samstundis, sum tvey nýggj stjórastørv verða sett á Landsskrivstovuni. Tá vit vita, at nýskipað leiðandi størv kostað meira enn tað dupulta av stjóralønini so má haldast, at hetta samsvarar illa.

Líkningarráðið er helst tann almenni stovnurin, ið verður harðast raktur. Her eru játtaðar góðar tvær miljónir færri enn roknskapurin fyri 1988 sýndi. Hetta hendir samstundis sum nýggjar arbeiðsuppgávur verða lagdar til stovnin. Tí kunnu vit ikki annað enn spyrja: hvat skal ikki gerast komandi árið av tí, sum stovnurin arbeiðir við longu nú, og hvørjar av nýggju uppgávunum skulu ikki farast undir?

Fyrireikingin til samhaldsføstu arbeiðsmarknaðareftirlønina skuldi longu verið farin í gongd, men har er einki hent enn. Skal skerjingin hjá Líkningaráðnum takast sum tekin um, at heldur einki verður gjørt við hetta komandi ár?

Tann bundna uppsparingin er tikin frá borgarunum í ár, saman við skattinum, á slíkan hátt, at eingin veit, hvat er uppsparing og hvat er skattur. Tað verður ein stór eykauppgáva at fáa skil á hesum. Hvussu skal Líkningarráðið megna hetta aftrat við skerdari játtan?

Tolleftirlitið og Gjaldstovan skulu virka væl fyri at fáa fatur á øllum tollinntøkunum og fáa skattin inn. Hesar stovnar hevur meirilutin í fíggjarnevndini eisini skert.

Eisini Almannastovan, Landsskúlafyrisitingin og Landsverkfrøðingsstovnurin verða skerd og har serliga Landsverkfrøðingurin.

Sjálvandi skal ansast eftir, at almenna umsitingin ikki veksur ørt, men hinvegin má vera skil í sparingunum. Almannastovan hevur slíkt slag av virksemi, at tá ringar tíðir eru, so vaksa uppgávurnar hjá stovninum. Nú skulu tey klára eyka arbeiði við nógv minni arbeiðsmegi.

Landsverkfrøðingsstovnurin hevur neyvt samband við alt virksemi á samferðsluøkinum, tí kunnu vit longu her síggja, at ætlanin hjá samgonguni er, at minka virksemið á grein 13.

Long tíð er nú fráliðin, síðani lógin um umhvørvisvernd varð kunngjørd, og enn er einki stig tikið til at fáa hana at virka. Neyðugt verður nú at fáa gongd á hetta arbeiðið.

Skrásetingareftirlitið hevur gjørt vart við, at neyðugt er við ávísari upphædd fyri at gera nakað skilagott arbeiði at fáa eftirlitið at virka.

Sum víst varð á undir fyrstu viðgerð, so fer hendan fíggjarlógin at føra arbeiðsloysi við sær, og verður uppskotið hjá meirilutanum samtykt, verður enn verri. Almennu stovnarnir noyðast at siga fólki upp, um fíggjarlógin skal hava nakran møguleika at halda.

Javnaðarflokkurin fer tí at seta nøkur broytingaruppskot til hesa grein.

<u>Grein 12 Heilsumál</u>

Sjúkhúsverkið.

Í uppskoti sínum hevur landsstýrið serliga lækkað játtaninar til sjúkhúsini munandi og undir 1.viðgerð varð víst á hvørjar avleiðingar niðurskurðurin fær.

Leiðslan fyri sjúkhúsverkið hevur lýst hvørjar treytirnar eru fyri sparingunum og hevur víst á beinleiðis spariltøk.

Nøkur av spariltøkunum tykjast skilagóð, men tað eru ikki tær stóru upphæddirnar, sum fáast við hesum.

Tey uppskot, sum muna, er at niðurleggja og steingja deildir. Her eru pengar at spara, tí færri fólk verða í arbeiði.

Á Landssjúkrahúsinum skulu 50 fólk sigast upp beinanvegin. Hetta er sparing fyri sjúkhúsverkið. Men hvar skulu hesi fólk fara?

Og verður hetta nøkur sparing fyri samfelagið?

Eisini verður skotið upp at hækka uppihaldsgjaldið fyri røktarsjúklingar og skal hetta geva eina meirinntøku upp á kr. 2.700.000.

Flestu røktarsjúklingar á uppihaldsdeildini eru úr smáum kommunum, ið hava lítið inntøkugrundarlag. Tað verður tí fíggjarliga tyngjandi fyri hesar kommunur, og haraftrat er hetta samfelagsliga eingin sparing.

Annað sparitiltak er at minka um viðlíkahald. Her eiga vit at ansa eftir, at vit ikki spara okkum til eitt vánaligt og illa hildið sjúkhúsverk.

Avtalan um sjúkhúsbygging, ið gjørd var av landsstýrissamgonguni 1985-88 fær illa verið framd, um vit skera so djúpt, sum skotið er upp.

Helmingurin av sjúkhúsútreiðslunum er ríkisstudningur. Sparingin er tí fyri ein part flyting av donskum peningi til annað endamál enn avtalað.

Niðurskurðurin á Suðuroyar Sjúkhúsi er næstan tað sama, sum at leggja sjúkhúslð niður.

Uppskotnu skerjingarnar eru:
1. 3.yvirlæknin ikki settur
2. vaskaríið niðurleggjast, 3 fólk sigast upp
3. nýggju sjúkrasystrastørvini ikki sett
4. vasking fella burtur sunnudag
5. 2 ljósmøðrastørv leggjast niður (av 3), og allar barnakonur skulu flytast til Havnar.

Hesar skerjingar føra við sær, at Suðuroyar sjúkhús veruliga ikki meira verður eitt sjúkhús fyri oynna.

Tað er ikki gjørligt at gera lítararbeiði, tá ikki serkønt fólk skal verða knýtt at sjúkhúsinum alt samdøgrið.

Javnaðarflokkurin tekur ikki undir við hesi beinskerjing av Suðuroyar sjúkhúsi.

Javnaðarflokkurin kann ikki taka undir við øllum teimum skerjingum, sum meirilutin ætlar at gera á Klaksvíkar Sjúkhúsi. At deildir skulíu lata aftur fleiri mánaðir á summri, á páskum og á jólum vil økja munandi um tær longu bíðirøðirnar. Hesar skerjingar føra eisini til, at nýbygda skurðstovan, als ikki verður nýtt í tann mun ætlanin var.

Javnaðarflokkurin fer at seta nøkur broytingaruppskot til hesa grein.

<u>Grein 13: Samferðslumál</u>

Sum áður nevnt mælir javnaðarflokkurin til, at hækka rakstrarstaðið 13001 til 131,5 mill. kr. til tess at minka um arbeiðsloysið víða um landið, og roknað verður við, at hesar 25 mill. kr. verða nýttar til slík arbeiði, ið krevja væl av fólki.

Lán til gerð av undirsjóvartunnli er heimtikið og stendur á bók, helst nógv mikið til at arbeiða í 1 1/2 ár, tí kann hetta arbeiði fara í gongd uttan, at uttanlandaskuldin verður økt beint í løtuni. Hetta arbeiði gevur færri manntímar enn nøkur av teimum, ið Landsverkfrøðingsstovnurin annars umsitur, men vitað er, at hópur av amboðum og flutningstólum standa og hava ilt við at fáa fyri avskrivingar.

Hetta berghol er fyri meginpartin ætlað fíggjað við "bummpeningi" og stendur tí øðrvísi í búskaparmyndini enn aðrar íløgur, og hartil hevur íløgan ikki einans týdning fyri lokaløkini, men fyri meginpartin av Føroya fólki og fyri menningina í flutningsmøguleikunum millum Føroyar og útlond. Hetta kann fáa ómetaliga stóran týdning, nú vit eru kroyst til at fáa til vega meira fyri útflutning okkara.

Ávís sparing liggur eisini í at fara í gongd í 1990 (eitt nú í mars/apríl), tí rentingin av teim 40 milj. krónunum, sum nýttar eru, er ikki eingin, og eisini kostar tað at halda byggiplássið løkt, meðan bíðað verður. Tær 40 milj. krónurnar, nýttar eru, eru mest farnar til keyp av útgerð uttanlands, meðan tað, sum nú stendur fyri at gera, kemur at merkja tiltak í føroyska samfelagnum av 40-50 milj. krónum.

Hvørki Landsstýri ella samgongumeirilutin í fíggjarnevndini hava gjørt vart við, hvørji byggiarbeiði halda fram ella fara í gongd í 1990. Tað er tí vónleyst hjá Javnaðarflokkinum at geva tilmæli um hetta, men flokkurin vil fegin í fíggjarnevndini taka upp samráðingar við Landsverkfrøðingin/Landsstýrið um hetta tíðliga í 1990.

Men sum skilst, merkir ein játtan uppá 106 milj. krónur, at flestu byggiarbeiði verða at bíða og tært verður munandi uppá framdar úthyggingar. Verður eingin hækking uppá 25 milj. krónur, og fer undirsjóvartunnilin ikki í gongd, skal stórt tal av fólki, ið kanska teljast í hundraðum, leita sær arbeiði á einum arbeiðsmarknaði, har frammanundan er ov lítið at gera.

Játtanin til Strandferðsluna varð munandi skerd í 1989 og enn meira sambært tilmæli fyri 1990. Serliga hevur Suðuroyggin verið meint rakt - sparing í 1989 umleið 20 milj. krónur og sera tilvildarlig sigling við stórum frávikum frá skerdu ferðaætlanini. Mikudag er bert einaferð samband millum Suðuroynna og Tórshavn, og tað er ikki nøktandi.

Út frá hesum og væntaðum oljuprishækkingum verður skotið upp at hækka játtanina til Strandfaraskip Landsins 5 milj. krónur.

Javnaðarflokkurin fer at seta nokur broytingaruppskot til hesa grein.

Grein 14: Skúlamál

Fíggjarlógaruppskotið, sum landsstýrið legði fram í heyst minkaði játtanina til skúlaverkið við umleið 30 miljónum í mun til verandi fíggjarár.

Javnaðarflokkurin hevur víst á, at um arbeiðast skuldi innan fyri ásettu upphæddimar, so fór at verða torført at fylgja galdandi lógum, viðtøkum og løgtingssamtyktum á hesum øki. Vandi var fyri vánaligum útbúgvingum, og færri møguleikum fyri børnini, tey ungu og eisini onnur.

Nú hevur meirilutin í fíggjarnevndini lækkað játtanina til grein 14 við 9 milj. afturat.

Studentaskúlanir og HF-skeiðini fáa eftir uppskotinum nakað minni játtað. Tað er torført at siga, hvønn beinleiðis týdning hesir niðurskurðir fara at fáa, men vandi er fyri eini generellari lækking av útbúgvingarstøðinum.

Men nakrar konti eru tó fyri munandi - ja, stórum skerjingum. Serliga er Føroya Maskinskúli hart raktur, við næstan 2 milj. í mun til roknskapin 1988. Tað eru ikki tvey ár, síðani skúlin fór undir hægstu útbúgving í landinum. Og í summar varð byrjað at útbúgva el-installatørar.

Broytingin hjá fíggjarnevndini er heilt burturvið og vil hava við sær, at onkrar av útbúgvingunum mugu niðurleggjast.

Ein annar stórur niðurskurður - 2 milj. - rakar játtanina til útgerð til tekniskar og handilsskúlar. Hetta fer at viðføra, at handverkarar og teknikarar fara at fáa eina annan floks útbúgving.

Skerjingarnar á hesum báðum økjum fara at verða til stóran skaða og afturgongd fyri okkara vinnulív og samfelagsmenningina, og Javnaðarflokkurin kann als ikki taka undir við hesum politikki.

Eisini handilsskúlin merkir sviðan. Eina miljón hevur meirilutin í fíggjarnevndini lækkað uppskotið. Hvønn týdning fær hetta fyri nýggja handilsskúlan í Eysturoynni, sum beint nú byrjar virksemi sítt? Vit kunnu ikki annað enn spyrja, hvat byggja vit hesar stóru glæsiligu skúlarnar til, tá vit ikki hava ráð at gera nýtslu av teimum ?

Grunnurin til útbúgving er skotin upp at vera 40 milj. - hetta er 5 milj. minni enn í 1989.

Javnaðarflokkurin heldur tað vera skeivt at gera skerjingar her. Tey ungu undir útbúgving, verða munandi verri fyri. Nógv av teimum hava vunnið sær nøkur oyru við síðuna av útbúgvingini, men nú, tá nógv minni arbeiði er, er væntandi, at tað verður truplari hjá teimum at fáa nøkur oyru eyka. Tí rakar tað hart hjá teimum eisini at fáa lækkaða stuðulsveiting. Eisini skal minnast á, at danir í blokkinum gjalda 25 milj. av grunninum til útbúgving.

Vilja tingmenn verðuliga skulka føroyingum undan at rinda sín part her ? Vit hildu annars, at blokkstuðulskipanin skuldi loysa okkum úr hoftum, har danir forðaðu útbyggingum. At hon skuldi nýtast til at hækka danska partin á ymsum økjum, vardi okkum ikki.

Javnaðarflokkurin fer at seta nøkur broytingaruppskot til hesa grein.

Grein 15: Vísindi, bókmentir og list;

Undir fyrstu viðgerð vísti Javnaðarflokkurin á, at grein 15 er tann greinin í fíggjarlógini, ið sambært uppskoti landsstýrisins var fyri størsta niðurskurði í mun til undanfarna ár. Meira enn 20%.

Nú hevur fíggjarnevndin skarvað enn meira av. Heilar 12,4 milj. so samlaði niðurskurðurin nú er omanfyri 30%. Eisini á hesum økinum hava stovnarnir víst á, at ikki ber til at virka eftir teimum lógum og viðtøkum, sum tingið hevur gjørt.

Hvørki bókasavnslógini, sum er tvey ára gomul ella samtyktini hjá løgtinginum fyri trimum árum síðani um Fróðskaparsetur Føroya sum hægri lærustovn ber til at fylgja við teimum játtanum, ið nú eru skotnar upp.

Fiskirannsóknarstovan og Heilsufrøðisliga Starvsstovan verða eisini skerdar hóast hesir stovnar alla tíðina fáa álagt fleiri og fleiri uppgávur. Serliga skal vísast á, at Heilsufrøðisliga Starvsstovan skal umsita týdningarmiklar lóggávur - eitt nú matvørulóggávuna og umhvørvislógina.

Javnaðarflokkurin fer at seta nøkur broytingaruppskot til hesa grein.

Grein 16: Fiskivinna, sigling o.t.

Sum frammanfyri nevnt , skal veiðutrýstið á heimaleiðunum minkast. Hetta noyðir framleiðsluliðið at grunda seg á minni rávørunøgd, sum má viðgerast til háverdugari vøru, enn vit framleiða í dag.

Halda vit fram við at økja studningin til tess at halda fast við verandi veiðumynstur, veiðuamboð, framleiðslu og sølu, er vandi fyri, at enn meira av okkara útfluttningi fer av landinum viðgjørd til lítið virði.

Tann veruleiki, at tann parturin av okkara størsta tilfeingi - upsanum - sum gevur ein toluliga hampuligan útfluttningspris nú bert er 10 %, og at parturin av samlaða botnfiskatilfeinginum, sum fær slíkan prís, bert er 28 % má siga okkum, at nú kemur óforsvarliga lítið burtur úr. (1988)

90 % av øllum frystum upsavørum fara nevniliga av landinum sum blokkklíknandi vøra og 72% av øllum frystum vørum eru av hesum slag, og skulu nýtast til víðari framleiðslu aðrastaðir. Hetta er ótolandi.

Skal hetta broytast er neyðugt at vinnan veit, at studningsupphæddin er løgd føst og kanska líðandi fer at minka, og hartil, at studningsskipanin verður broytt soleiðis, at bert vøra av ávísari góðsku og við rímuliga høgum prisi, kemur undir skipanina.

Stuðulin má tí tengjast at útfluttningsvøruni og síðan virka aftur ígjognum skipanina, og vøra sum fær minni enn rímuligt er, má falla burtur úr skipanini.

Løgmaður hevur í Keypmannahavn boðað frá, at studningurin verður avtikin eftir trimum árum. Hetta heldur Javnaðarflokkurin er í so bjartskygt, men metir tað møguligt heldur at leggja studningsskipanina í heilt fastan karm. Hvør upphæddin tá er, hevur minni týdning.

Landsstýrið 1985-89 miðaði ímóti at skapa ein fastan karm áleið 250 - 300 milj. kr. og eyðnaðist hetta í árunum 1985, 86 og 87, men tíverri vóru vit í 1988 ikki fyrireikaðir at byggja upp fyri prísfallinum tá og bleiv upphæddin tí einar 120 milj. kr. hægri.

Kondemneringsskipanin, samtykt varð av sama stýri, virkaði - tó at sitandi samgonga metir hana ónýtiliga - so mikið væl, at 18 skip fóru úr flotanum.
Hesi høvdu eina roknaða veiðuorku uppá 7000 tons av botnfiski .
Síðani er onki skip komið undir upphøggingarskipanina.

Semja verður helst ongatíð um hvønn veiðuháttr vit eiga at leggja høvuðsdentin á, ella hvussu veiðuhættirnir skulu samvirka á grunninum.
Tá nú kortini orka skal takast burtur úr, heldur Javnaðarflokkurin, at tað var reynd vert at taka eini fýra-fimm pør t. v. s. átta-tíggju skip burtur 'ur botnfiskiveiðuni og sleppa hesum í 'idnaðarveiðu.

Kvoturnar eru nóg stórar til hetta, tá hugsað verður um Norðsjóarøkið. So hetta kann gerast uttan at hækka samlaða dagatalið til íðnaðarveiðu á Føroyaøkinum.
Við øðrum orðum eigur upphøggingarskipanin at verða útbygd soleiðis, at veiðuloyvi til botnfiskaveiðu við Føroyar kunnu verða keypt fyri so mikið høgan prís, at eini átta til tíggju skip kunnu gerast so bílig, at tey kunnu reka íðnaðarveiðu við vinningi.

Slík loyvi skulu hesi skip so fáa ístaðin.

Hóast serliga ein samgonguleiðari heldur, at svartakjaftaroyndirnar hava verið burtur við, er Javnaðarflokkurin av teirri áskoðan at hesar royndir eiga at halda fram. Hetta ríka tilfeingi má fáast til sættis sum dygdarvøra og fóðurvøra.

Flokkurin skjýtur tí upp, at 25 milj. kr. verða nýttar til hetta endamál.

Tað at danir í dag veruliga royna at fáa dygdarvøru burtur úr hvítingsbróðri eggjar okkum enn meira til at fáa slíka burtur úr tí nógv betra svartkjaftinum.

Javnaðarflokkurin fer at seta nøkur broytingaruppskot til hesa grein. M.a. minna á, at grunnurin til endurnýgging av fiskiskipaflotanum hevur nakrar gjaldsskyldur, sum landskassin er bundin av.

<u>Grein 18: Handil, íðnaður o.t.</u>

Undir hesi grein mælir meirilutin til. at játtanin til Arbeiðseftirlitið verður skerd við 1.350.000 kr. Í mun til fíggjarlógina fyri 1988 er talan um eina lækking uppá 28%.

Undir seinasta landsstýri var Arbeiðseftirlitið útbygt við deildum kring landið. Talan er um fýra deildir uttan fyri høvuðsstaðin. Sambært uppskoti landsstýrisins og meirilutan í fíggjarnevndini fáa hesar deildir onga játtan í 1990. Øll játtanin er sett undir einum, og hesum kann Javnaðarflokkurin ikki taka undir við. Mælt verður tí til, at deildirnar úti um landið fáa sína egnu játtan, og harvið varðveita sína viðurkenning.

Eitt virkið arbeiðseftirlit fremur munandi størri trygd á arbeiðsplássinum. Hesa trygd fyri hin einstaka leggur Javnaðarflokkurin sera stóran dent á, og kann tí heldur ikki taka undir við, at samlaða játtanin til stovnin verður skerd.

Minnilutin dugir heldur ikki at síggja nakra sparing í tí, at játtanin til arbeiðseftirlitið verður skerd. Tvørturímóti vil tað almenna, við einum væl útbygdum, væl skipaðum og effektivum arbeiðseftirliti spara munagóðar upphæddir yvir t.d. heilsuverkið og almannaverkið og á annan hátt.

Í Danmark kosta arbeiðsvanlukkur tí almenna 28 milliardir um árið. Umroknað til føroysk viðurskifti svarar hetta til 280 milj. kr. árliga.

Javnaðarflokkurin fer at seta nøkur broytingaruppskot til hesa grein.

Grein 19: Almannamál:

Í tíðum, tá stórur partur av okkara fólki illa dugir at síggja sær møguleikan at vinna sær til lívsins uppihald, tí arbeiði er lítið at fáa, dugir Javnaðarflokkurin illa at síggja rættleikan í at skerja játtanir undir hesi grein munandi.

Tá ótryggleiki valdar á arbeiðsmarknaðinum og arbeiðspláss frá hond verða sindrað, tí teir stýrandi hava valt munandi at minka um almenna fyritakssemið og tí at fyritøkur í stórum tali á sjógvi sum á landi steðga, tykir Javnaðarflokkinum skeivt ikki at stimbra sosiala tryggleikagrundarlagið.

Politikkur landsstýrisflokkana er at skerja tær mest týðandi sosialu lógirnar. - Fyri hesum gongur sjón fyri søgn.

Lógin um inntøkumark pensionistana uttan at missa av sjálvari pensiónini skal setast úr gildi, hetta tykir 12 milj. kr. niðurskurðurin á fólkapensiónini at vátta.

Studningur til ellis- og røktarheim lækkast við 2 milj. kr. merkir, at starvsfólk á ellis- og røktarheimum partvíst skulu úr starvi.

Hesir stovnar eru ikki ov væl mannaðir frammanundan.

Forsorgarhjálpin, einasta hjálp, ið veitt verður, um arbeiðsloysi valdar og tí eingin inntøka, er sett til 39 milj. kr., meðan veruligu útreiðslurnar heldur verða um kr. 60 milj.

Bústovnar verða skornir við 3 milj. kr. Tað fer at skerja møguleikarnar hjá ófullførum at kunna búleikast í egnum íbúðum og pensionatum.

Javnaðarflokkurin hevur hesi broytingaruppskot til uppskot meirilutans.

Broytingaruppskot

Grein 6: Landsstovnar

6.014	Strandferðaskip Landsins	+ 5.000.000	
6.033	Bygdaleiðir	+ 1.000.000	
6.358	Postverkið	+ 2.000.000	
Greinin sett til			52.013.000

Grein 7: Partur av avlopi danska tjóðbankans

7.011	Avlop	+ 10.000.000	
Greinin sett til			30.000.000

Grein 11: Landsfyrisitingin:

11.276	Skrásetingarefturlit	+ 150.000	
11.725	Stovnseting av landsbanka v.m.	+ 1.000.000	
Greinin sett til			150.041.000

Grein 12: Heilsumál:

12.109	Landssjúkrahúsið	+ 14.000.000	
12.202	Klaksvíkar Sjúkrahús	+ 2.200.000	
12.304	Suðuroyar Sjúkrahús	+ 2.300.000	
Greinin sett til			372.540.000

Grein 13: Samferðslumál:

13.001	Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegnum	+ 25.000.000	
Greinin sett til			289.800.000

Grein 14: Skúlamál:

14.414	Føroya Maskinskúli	+ 500.000	
14.471	Útgerð til tekniskar skúlar/handilsskúlar	+ 1.000.000	
14.901	Ymiskir studningar		
313.152	Grunnur til útbúgving	+ 5.000.000	
13.302	Íbróttar og skúlabyggigrunnur	+ 4.000.000	
Greinin sett til			389.825.000

Grein 15: Vísindi, bókmentir og list:

15.109	Landsbókasavn	+ 700.000	
15.755	Fróðskaparsetur Føroya	+ 400.000	
15.805	Heilsufrøðisliga Starvsstovan	+ 1.200.000	
323.331	Útvarp Føroya, tilskot til avdráttir av lánum	+ 1.000.000	
Greinin sett til			88.059.000

Grein 16: Fiskivinna, sigling o.t.:

16.904	Aðrir studningar:		
333.017	Minstaløn o.a. stuðul til fiskivinnuna	- 9.000.000	(viðm.)
333.025	Studningur til grunnin til endurnýggjan av fisk- og farmaskipaflotanum	+ 20.000.000	
333.058	Endurgjald fyri upph. av gomlum fiskiskipum	- 10.000.000	
Nýtt rakstarstað:			
	Serligar svartkjaftaroyndir	+ 25.000.000	
Greinin sett til			561.839.000

Viðmerking til 16.906/333.017	
Býta fyri minstuløn og annan stuðul:	
Prísískoyti og studningur	290.000.000
Minstaløn og minstaforvinningur	50.000.000
Umsiting	6.000.000
Serligur grunnur	15.000.000
At taka til bert eftir nýggjari løgtingsviðgerð	64.000.000
Tilsamans	425.000.000

Grein 17: Landbúnaður og matrikulering:

17.307	Skógrøkt Landsins	+ 400.000	
Greinin sett til			45.650.000

Grein 18: Handil, iðnaður o.t.:

18.109	Arbeiðseftirlit	- 1.395.000	
18.114	Arbeiðseftirlit í Klaksvík	+ 604.000	
18.128	Arbeiðseftirlit á Tvøroyri	+ 600.000	
18.133	Arbeiðseftirlit í Saltangará	+ 879.000	
18.147	Arbeiðseftirlit í Vestmanna	+ 662.000	
18.365	Javnstøðunevndin	+ 100.000	
Greinin sett til			45.224.000

Grein 19: Almannamál v.m.:

19.042	Andveikraverndin, bústovnar	+ 2.000.000	
19.056	Fólkapensión	+12.000.000	
19.075	Røktarheim	+ 2.000.000	
19.403	Vanlig forsorg	+20.000.000	
363.524	Barnastyrkur v.m.	+20.000.000	
363.685	Húsalánsgrunnurin	+ 3.000.000	
19.918	Skúlin á Trøðni	+ 1.000.000	
Greinin sett til			851.256.000

Uppskot
til
samtyktar

I

"Landsstýrinum verður álagt at leggja uppskot fyri Løgtingið, ið hevur til endamáls at broyta skattalógina soleiðis, at rentufrádrátturin verður lækkaður úr 42 niður í 27%. Samstundis skullu fólk við húsalánum fáa avdráttarfrádrátt ella beinleiðis stuðul, sum svarar til lækkingina í rentufrádráttinum"

II

"Landsstýrinum verður álagt at broyta ta reglugerð, sum loyvir bankunum skattafríða avseting, soleiðis at avsetingin verður 6% ístaðin fyri 11%."

III

"Landsstýrinum verður álagt at leggja uppskot fyri Løgtingið um broytingar í lógini um skattligar avskrivingar v.m., soleiðis at í grein 20, 1. stk. verður frá 1. januar 1990 7% broytt til 5% og 4% broytt til 2%, ella uppskot, sum stigvíst fremur hesa broyting.

IV

"Landsstýrinum verður álagt at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta rentufrádráttin hjá vinnurekandi soleiðis, at bert nettorenta kann dragast frá. Víst verður annars til viðmerkingar í álitinum hjá minnilutanum."

V

"Landsstýrinum verður álagt at leggja uppskot fyri Løgtingið um broytingar í lógini um tvungna uppsparing soleiðis, at inntøkubólkurin kr. 110.000 - 150.000 verður frítikin fyri samansparing. Inntøkubólkurin kr. 150.000 - 200.000 og omanfyri kr. 200.000 spara saman ávíkavist 2,5 % og 3,5 % í 1990."

VI

"Landsstýrinum verður álagt at gera uppskot um broyting í reglugerðini fyri upphøggingarstuðul soleiðis, at heimild verður at rinda fyri innlatin fiskiloyvi til botntroiling við Føroyar og ístaðin fyri veita fiskiloyvi til ídnaðarveiðu. Samstundis verður dagatalskipan fyri ídnaðarveiða á føroyska landgrunninum sett í verk."

VII

"Løgtingið áleggur Landsstýrinum at javnføra reglurnar um inntøkujavning og at leggja fyri løgtingið uppskot um at seta § 3 í upprunalógini um barnastyrk aftur í gildi."

Meirútreiðslurnar sambæri hesi broytingaruppskot eru kr. 154,3 milj.kr.

Teir inntøkumøguleikar sum eru ávístir í áliti minnilutans verða mettir at geva Landskassanum eina meirinntøku uppá 240 milj. kr.

Sostatt kann reguleringskonto hækkast úr 30 milj. kr. upp í 50 milj. kr., og yvirskot -70 milj. kr. - setast á bundna konto til avloysing av innsetta láninum til undirsjóvartunnilsgerðina.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) ásannar, at kapitalstreymurin inn í landið tey sennu árini í alt ov stóran mun hevur gjørt seg galdandi og verið viðvirkandi til ta búskaparligu slagsíðu tjóðini hevur verið fyri.

Samstundis verður harmast um, at tey sjónarmið, sum Kristiligí Fólkaflokkurin, Føroya Framburðs- og fiskivinnuflokkur, førdi fram, í samband við henda ótálmaða kapitalstreym, ikki vórðu givin gætur.

Áheitanir okkara um at fáa steðga hesum peningastreymi, sum floymdi inn á okkum uttaneftir, vóru tíanverri ikki givnar ans!

Eitt upphitað byggivirksemi gjørdis bara meir og meir yvirupphitað, og førdi við sær, at høvuðsvinna okkara - fiskivinnan í stóran mun varð drenað fyri arbeiðsmegi, soleiðis, at bæði skip og virki løgdu stilt - ella høvdu tað sera trupult orsakað mangalandi arbeiðsmegi.

Eisini førdi hetta við sær, at fremmand arbeiðsmegi sum ongantið áður kom til landa og óskattaður peningur fór av landinum.

Hetta var í teim døgum - og tó ikki so lang síðan - at reypini um køna fíggjar - og búskaparstýring gellaðu millum fjalla, og komu sjálvandi frá teim, ið hildu um fíggjar- og búskaparstýrisvøl Føroya. - Eisini frá teim, ið nøkur ár frammanundan høvdu givið lyfti um, at skútan Føroyar innan 500 dagar skuldi koma búskapariliga aftur á rætt kjøl.

Nú tykist alt reyp at vera tagna - og tað av góðum grundum! Allir grunnar tómir og ein uttanlandaskuld uppá 7,7 milliardir - tá seinast varð gjørt upp, væl at merkja.

Ein uttanlandsskuld, ið er heilar 3 mia. hægri, enn tað almenningurin fekk at vita beint áðrenn val fyri bert góðum ári síðan. Og hann fekk tað at vita frá teim, ið áttu at vita betri ella kanska vistu betri.

Er tað tí so løgi, at henda sama veljara fjøld í dag stendur púra ovfarin, ørkymla og spyr: Hvussu í víðastu verð kann slíkt koma fyri???

At uttanlandaskuldin nú visir seg at vera nærum tað dupulta av tí, sum boða varð frá fyri góðum ári síðan er skelkandi og kann á ongan hátt hava økt um okkara kreditvirði

úteftir, men kanska heldur hinvegin enntá minkað um okkara trúvirði!

Nógv hevur verið tosað um, hvør íð átti hesa skuld í útheiminum, og hevur hetta eisini verið ført fram í royndunum hjá ávísum politískum flokkum at skava útyvir mistøk og vána stýring.

Uttan tó at koma nærri inn á býti av hesi uttanlandaskuld, so eigur at verða sligið fæst, at tað almenna eigur sín part og at politiski mynduleikin beinleiðis ella óbeinleiðis er orsøkin til, at støðan er tann hon er, og eisini at løgtingsins fíggjarlóg í alt ov stóran mun er bólgnað!

Kristiligi Fólkaflokkurin tekur í hvussu so er fulla ábyrgd av broytingum sum farnar eru fram á familjupolitiskaøkinum eins væl á almannaøkinum sum heild, ta tíð flokkurin var í samgongu. Her verður fyrst og fremst hugsað um barnastyrkin og skipanina um barnsburðarfarloyvi, sum eisini kom at umfata heimaarbeiðandi mammuna eins væl tær, ið eru í tímaløntum arbeiði. Eisini verður hugsað um tey tiltøk, sum hjálpt hava um støðuna hjá teim brekaðu og gomlu í okkara samfelag.

Vit ásanna sjálvandi, at hesi gagnligu tiltøk hava havt økta útreiðslu við sær á løgtingsins fíggjarlóg.

Tá lurta verður eftir "Det rådgivende udvalg vedrørende Færøerne" og hugt verður eftir rokniskapum, so má ásannast at valárið 1988 gjørdist dýrt fyri tað føroyska samfelagið og bendir nógv á, at myndin hevði verið munin bjartari um nýval varð útskrivað, tá landsstýrið á vár hetta árið misti sín parlamentariska meiriluta.

Hetta árið var talan um eina meirnýtslu upp á kr. 244.072.918,19 harav ein stórur partur ikki varð lógarbundin ella hevði nakra aðra heimild fyri meirnýtslu. Hetta vísir "Det rådgivende udvalg" eisini á í síni frágreiðing 1989.

Frá ymiksum síðum hevur ymiskt verið ført fram um hesi viðurskifti - og tá ofta ósakligt og einvíst.

Minnilutin metir hesi viðurskift av slíkum týdningi, at tey ikki bert kunnu "hanga í leysari luft", men at tey verða fingin uppá pláss. Hetta kann best og einans gerast av óvildugum persónum og verður tí sett fram soljóðandi

U P P S K O T

til

samtykkar

"Álagt verður landsstýrinum at seta eina nevnd av 3 óvildugum persónum at kanna og skriva álit um meirnýtsluna hjá landskassanum fyri 1988, og at hetta verður lagt fyri tingið til viðgerðar."

Sitandi samgonga millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Tjóveldisflokkin boðaði í summar frá, at hon vildi seta "serlig tiltøk" í verk fyri at fáa "búskapin aftur á føtur". Og var farið til verka: Eykaskattur við afturvirkandi kraft, gjørdist eitt av hesum "serligu tiltøkum". Vanligi arbeiðsmaðurin, verkamaðurin fekk nú stein oman á byrðu. Vanligi løntakarin kom av álvara at merkja sviðan og kendi seg drignan til svars fyri gerðir hann als ikki var sekur í.

Áðrenn lógin var samtykt vóru tað helst fleiri innan verkamanna fjøldina, sum høvdu sett sítt álit á Tjóveldisflokkin, at hesin í hvussu so var, fór at fyribyrgja ar vanligi løntakarin kom undir skipanina um eykaskatt. Men hesi vórðu so dyggiliga svikin. Tí sum kunnugt komu enntá láginntøkurnar at bera sín part av byrðuni! Ja heilt niður á 110.000 kr. varð farið fyri at "rætta búskapin".

50% skattamarkið var sprongt, hóast Fólkaflokkurin stutt frammanundan fyri Føroya fólki hevði sagt, at "fast eigur at haldast um 50% markið - og at teir framhaldandi vildu arbeiði fyri eini rættvísari skattabyrðu", og hevði givið lyfti um skattalættan.

Kristiligi Fólkaflokkurin mótmælti hesum órættvísa skattapolitikki og hevur eisini síðan fleiri ferðir á tingi havt uppskot um at lætta um byrðarnar hjá teim, ið serliga komu at kenna sviðan av hesum "serligu tiltøkum" samgongurnar.

Hvussu hevur so gingist við hesum tiltøkum? Jú, tað er sjón fyri søgn!

Hóast samgongumenn dúgliga hava roynt at víst aftur teim dapru avleiðingum av nevndu tiltøkum, so er veruleikin tíanverri ein annar! Tí, hesi tiltøk, saman við øðrum, hava nevnliga ført manga familju kring landið út í fíggjarliga trongstøðu. Hesin skattur við afturvirkandi kraft, hevur gjørt, mikið ikki hevur verið at svara hvørjum sítt, og serliga hart hevur tað rakt tær mongu familjur kring landið, sum fyri stuttum hava fest búgv og stríðast við rentur og avdráttir av stórum lánum! Eftirstøðurnar í peningastovnum vaksa og stórur vandi er fyri, at mong koma at missa tak yvir høvdið. Ásannandi hetta - og fyri í stóran mun at fyribyrgja at so verður, hevur Kristiligi Fólkaflokkurin uppskot á tingi, um at leingja afturgjaldingartíðina fyri lán úr Húsalánsgrunninum og at hesi lán í eitt ávíst áramál verða rentu og avdráttarfrí.

Men tá nógv bendir á, at hetta uppskot okkara fær somu lagnu sum løgtingsmál nr. 27/1989: Løgtinglóg um útgjalding av bundnari samansparing til rentur og avdráttir fyri sethús, sum eisini var okkara, loyvir minnilutin sær nú talan hevur verið um, at landskassin fór at taka stór lán heim úr útlondum, at seta fram soljóðandi

U P P S K O T

til

samtyktar

"Álagt verður landsstýrinum at økja munandi um fíggjarorku Húsalánsgrunnsins soleiðis at hesin í nógv større mun kann veita neyðug lán."

Ein onnur døpur avleiðing av tiltøkum landsstýrisins tykist at vera, at hugur og áræði til verk fjarðar millum manna. "Tað loysir seg ikki at arbeiða" er mangan at hoyra. Grundgevingin er altíð, at "skattur er ov høgur - bert 300 -400 kr. eftir av hvørjum tjentum 1.000 kr."

Henda avleiðing er ógvuliga álvarsom og kann ongantíð

verða ganlig fyri føroysku tjóðina. Meginreglan má vera, at tað altíð loysir seg at arbeiða og tað nógv.

Eitt fyribrigdi, sum so at siga hevur verið ókent her á landi er arbeiðsloysi. Tíanverri eru nú alt ov nógv dømi um, at so er ikki longur. Eisini hetta sum avleiðing av tiltøkum landsstýrisins. Verkafeløgini kring landið hava vist á støðuna og dagliga hoyrist um fólk, sum søgd eru úr starvi.

Minnilutin hevur ongantíð ivast í, at neyðugt var at seta tiltøk í verk, sum bremsaðu samfelagshjólunum í eitt rímiligt mát, men ongantíð mælt til og enn minni tikið undir við bremsing (blokadu) hvørs avleiðingar nú vit hugstoytt eru vitni til.

Henda uppbremsing samgongurnar er ov hørð og tí eisini skilaleys, og hevur alt ov mangar negativar avleiðingar við sær. Betri var, soleiðis sum vit hava vist á, at bremsað hóvligari og yvir eitt longri tíðarskeið.

Vegurin fyri arbeiðsloysistuðli er lagdur - og hvør skuldi trúð, at teir báðir Fólka- og Sambandsflokkurin skuldu sláa fyri tí, ið vinstraflokkar hava gjørt seg til talsmenn fyri?!

Minnilutin er av tí áskoðan, at tað er umráðnadi at nógmikið arbeiði er til allar arbeiðsførar hendur, og at tað beinleiðis er skaðiligt fyri land og fólk at arbeiðsloysi "fær fótin fyri seg".

Óheppi er tað, at bæði privat og alment virksemi so at siga steðgar samstundis. Neyðugt er at arbeiði kring landið verður hildið á passandi støði, og verður í uppskoti minnilutans eisini tikin hædd fyri hesum á § 13.

Viðvikjandi undirsjóartunnlið um Vestmannasund, er at viðmerkja, at lán til gerð av hesum tunnlið er heimtikið og tí eigur at verða farið í gongd við hetta arbeiði. At fast samband fæst við Vágoynna og harvið einasta flogvøll í landinum, kemur at hava alstóran búskaparligan týdning fyri samfelagið, tá hugsa verður um øktar eksportmøgulkeikar via flogferðsluna. Eisini kemur hetta at hava stóran týdning fyri Vágoynna sum part av føroyska samfelagnum.

Henda íløga verður eftir ætlan fíggjað við bumpeningi og kemur sostatt ikki, sum aðrar íløgur, at tyngja um lands-

kassan.

Í grunn. Verður játtað saman við fíggjarnevndini.	I fond. Bevilges sammen med finansudvalget.

FÍGGJARNEVNDIN, 30. december 1989.

Anfinn Kallsberg Flemming Mikkelsen Heine O. Heinesen

Eilif Samuelsen Jørgen Thomsen Jógvan Durhuus

Tordur Niclasen

2. viðgerð 29. december 1989.

Broytingaruppskot til § 1 frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 3-0.
§ 1 í uppskoti meirlutans samtykt við 21-0.
§ 2 í uppskoti meirlutans samtykt við 23-0.
§ 3 í uppskoti meirlutans samtykt við 28-0
§§ 4 og 5 í meirlutans uppskoti samtyktar við 22- 0.
Broytingaruppskot til § 6 frá minnilutanum (Jørgen Thomsen) fall við 7-0, og broytingaruppskot til § 6 frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 2-0. § 6 í meirlutans uppskoti samtykt við 21-0.
Broytingaruppskot til § 7 frá minnilutanum (Jørgen Thomsen) fall við 7-0, og broytingaruppskot til somu frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 2-0.
§ 7 í meirlutans uppskoti samtykt við 21-0.
§§ 8 og 9 í meirlutans uppskoti samtyktar við 30- 0.
Broytingaruppskot til § 10 frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 2-0.
§ 10 í meirlutans uppskoti samtykt við 21-0.
Broytingaruppskot til § 11 frá minnilutanum (Jørgen Thomsen) fall við 7-0 og broytingaruppskot til somu frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 2-0.
§ 11 í meirlutans uppskoti samtykt við 21-0.
Broytingaruppskot til § 12 frá minnilutanum (Jørgen Thomsen) fall við 9-0 og broytingaruppskot til somu frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 2 0.
§ 12 í meirlutans uppskoti samtykt við 21-0.
Broytingaruppskot til § 13 frá minnilutanum (Jørgen Thomsen) fall við 7-0 og broytingaruppskot til somu frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 2-0.
§ 13 í meirlutans uppskoti samtykt við 21-0.
Broytingaruppskot til § 14 frá minnilutanum (Jørgen Thomsen) fall við 7-0 og broytingaruppskot til somu frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 2-0.

§ 14 í meirlutans uppskoti samtykt við 21-0.
Broytingaruppskot til § 15 frá minnilutanum (Jørgen Thomsen) fall við 7-0 og broytingaruppskot til somu frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 2-0.
§ 15 í meirlutans uppskoti samtykt við 21-0.
Broytingaruppskot til § 16 frá minnilutanum (Jørgen Thomsen) fall við 7-0 og broytingaruppskot til somu frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 2-0.
§ 16 í meirlutans uppskoti samtykt við 22-0.
Broytingaruppskot til § 17 frá minnilutanum (Jørgen Thomsen) fall við 7-0.
§ 17 í meirlutans uppskoti samtykt við 23-0.
Broytingaruppskot til § 18 frá minnilutanum (Jørgen Thomsen) fall við 7-0 og broytingaruppskot til somu frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 2-0.
§ 18 í meirlutans uppskoti samtykt við 21-0.
Broytingaruppskot til § 19 frá minnilutanum (Jørgen Thomsen) fall við 9-0 og broytingaruppskot til somu frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 9-0.
§ 19 í meirlutans uppskoti samtykt við 21-2.
Broytingaruppskot til § 20 frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 2-0.
§ 20 í meirlutans uppskoti samtykt við 25-0.
§ 21 í meirlutans uppskoti samtykt við 27-0.
Broytingaruppskot til § 22 frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fall við 2-0.
§ 22 í meirlutans uppskoti samtykt við 21-0.
§ 23 í meirlutans uppskoti samtykt við 23-0.
§§ 24-45 í meirlutans uppskoti samtyktar við 21-0.

At fíggjarløgtingslógin skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

Uppskotini til samtyktar frá minnilutanum (Jørgen Thomsen) I fall við 7-0, II við 7-0, III við 9-0, IV við 7-0, V við 11-0, VI við 8-0 og VII við 8-0.
Uppskotini til samtyktar frá minnilutanum (Tordur Niclasen) fullu við 2-0, 3-0, 11-0, 10-0, 3-0, 5-0 og 2-0.

3. viðgerð 30. december 1989.

Broytingaruppskotið frá fíggjarnevndini samtykt við 22-0 atkvøðum. Fíggjarlógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum. Málið avgreitt.

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 29. september 1989

F. L. j. nr. 508-3
(at fakkala á svarið)

Tlf. 11000 . Telex 81310 flogas fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Afgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 11/1989: Veiting av ríkisborgararætti.

U p p s k o t

til

samtykt

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 190 frá 29. mars 1989 og lóg nr. 342 frá 24. mai 1989 um veiting av ríkisborgararætti verða lýstar at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:
Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at nevndu lógir verða lýstar at galda í Føroyum.

Eftir hesum lógum verður eisini veittur 5 persónum, búsitandi í Føroyum, ríkisborgararættur.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

* skjal

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/

Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 11/1989: Veiting av ríkisborgararætti.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 20. september 1990 og eftir 1. viðgerð 26. september beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Durhuus, Poul Michelsen, Eilif Samuelsen og Tordur Niclasen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, og vísir nevndin á løgtingsmál nr. 97/89: Veiting av ríkisborgararætti, pkt. 2 í uppskoti landsstýrisins til samtyktar, ið hjóðar:

> "at spurningurin um ígildisseting av ríkisborgaralógum ikki longur verður at leggja fyri løgtingið, men kann avgreiðast av landsstýrinum einsamalt."

Minnilutin (Marita Petersen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað, men vísir til sína støðu í løgtingsmáli nr. 97/89: Veiting av ríkisborgararætti.

RÆTTARNEVNDIN, 4. mai 1990.

Jógvan Durhuus Marita Petersen Poul Michelsen

Tordur Niclasen Eilif Samuelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 20. september 1989

TIf. 11080 . Telex 61326 tlagm fo . Telefax 14941 . Postbox 64
Avgreiðslutíð kl. 10—15. Ivyrirmælt stongt

F. L. j. nr. 344-2
(at tilskila í svari)

SD/or

Løgtingsmál nr. 12/1989: Løgtingslóg um fígging av hølum til Tolleftirlitið.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um fígging av hølum til Tolleftirlitið.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at fíggja innrætting av hølum á Eystaru Bryggju í Tórshavn til Tolleftirlitið við fænum í grunninum til bygging av tollpakkhúsi.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om finansiering af lokaler til Toldkontrollen.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at finansiere indretning af lokaler på Eystaru Bryggja i Torshavn til Toldkontrollen med aktiverne i fonden til bygning af toldpakhus.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Landsstýrið góðkendi í 1987 at leiga ovastu hædd á matr. nr. 517[7] (gamli heilsølubygningurin hjá Kartna Winther frá Tórshavnar Kommunu) til tolleftirlitið. Samstundis varð samtykt at umvæla hølini og at fara undir detailprosjektering av umvælingini og at innheinta tilboð.

Leigusáttmáli er síðan gjørdur fyri 20 ár og er kostnaðurin 100

kr. pr. fermetur. Avgjørt er eisini at innrætta holini fy 6.526.389,52 kr. og at fíggja tað úr grunninum til bygging av tollpakkhúsi, rakstrarstað 44081-643406. Prosjekteringin, ið hevur kostað góðar 800.000 kr. er goldin úr grunninum og eftir eru 4.408.000 kr. Fíggjarnevndin hevur á fundi 15. juni 1989 játtað eykajáttan umleið 1.300.000 kr. til tað, ið restar í.

Sostatt skuldi verið klárt at farið undir arbeiðið, men í skrivi dagfest 11. mai 1989 hevur Grannskoðaradeild Landskassans gjørt vart við, at heimild ikki er fyri at nýta peningin í grunninum við tað at endamálið við honum er at byggja nýtt tollpakkhús. Sí løgtingstíðindi bind B 1971 bls. 20 viðmerkingar til fíggjarlóg-aruppskotið 1972/73.

Landsstýrið legði síðan málið fyri fíggjarnevndina hvørs niðurstøða var, at um peningurin skal brúkast úr grunninum, má heimild fáast fyri hesum við løgtingslóg. Fíggjarnevndin tekur tó til eftirtektar, at spurningurin um nýtt tollpakkhús ikki er aktuellur longur.

Viðmerkjast kann, at landsstýrið, tá avgerð varð tikin um at nýta peningin úr nevnda grunni, metti seg at hava heimild til hetta, við tað at tað, sum longu nevnt, ikki longur er aktuelt at byggja nýtt tollpakkhús og at tað í nevndu viðmerking til fíggjarlógar-uppskotið fyri 1972/73 verður sagt, at gjaldstovan kann verða í sama húsi. Sum kunnugt var tolleftirlitið tá ein partur av gjaldstovuni.

Landsstýrið hevur tó valt at tikið viðmerkingarnar frá grannskoð-aradeildini og avgerðina hjá fíggjarnevndini til eftirtektar og verður málið tí lagt fyri løgtingið.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/

Súsanna Danielsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 12/1989: Løgtingslóg um fígging av hølum til Tolleftirlitið.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. september 1989 og eftir 1. viðgerð 28. september beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur í hesum sambandi havt fund við yvirtollaran, stjóran á tollstovuni, landsarkitektin og Ivan Johannesen, landsstýrismann. Eisini hevur nevndin havt fund við býráðsskrivaran Høgna Mohr.

Málið snýr seg, um "grunnurin til bygging av nýggjum tollpakkhúsum" kann gjalda innrættingina av leigaðum hølum á eystara havnarøkinum.

Undir viðgerðini kom fram, at landsstýrið í december 1987 hevði givið loyvi til detailprojektering av innrætting av ovastu hædd í "gomlu" heilsølubygningunum hjá Kartni Winther, ið Tórshavnar havn nú eigur.

Projektið varð góðkent av landsstýrinum í mai 1988, og tilboð upp á arbeiðið vórðu fingin til vega og góðkend.

Ætlanin var, at peningurin skuldi gjaldast úr grunninum til nýtt tollpakkhús, men tá ávísingin upp á projekteringskostnaðin kr. 800.000 var goldin, gjørdi grannskoðannardeild landskassans vart við, at tair ikki hildu heimild vera fyri at gjalda pening úr grunninum til innrætting í leigaðum hølum. Í hesum var fíggjarnevndin samd og bað tí landsstýrið um at fara í løgtingið at fáa sær heimild.

Fíggjarnevndin heldur, at kostnaðurin av hesi innrætting er ógvuliga stórur, men hin vegin er hølið í dag bert eitt bert betongrúm við ongum vindeygum. Fyri at fáa hesi í, má øll yvirtromin gerast av nýggjum, og harafturat skal útbygningur gerast til lyftu og trappu.

Upplýst er, at um sáttmálarnir skulu annulerast, so

eru tað tó útreiðslur, sum ikki sleppast undan at gjalda. Hesar snúgva seg m.a. um projektering, ca. kr. 800.000, endurgjald fyri brotnar sáttmálar ca. kr. 600.000 og endurgjald fyri tilfar, sum er innkeypt, ella tilsamans einar 2 til 2,5 mió. kr. Hin vegin upplýsti Høgni Mohr, at síðani farið varð undir projekteringina, er einasta skip, ið nýtti "ro on - ro of" farið úr sigling, so tørvurin fyri at flyta tollararnar úr verandi bygningi, ikki er so bráðneyðugur, men um flutningur við "ro on - ro of" aftur kemur, so má núverandi bygningur hjá tollarunum takast niður beinanvegin.

Fíggjarnevndin hevur eisini reist spurningin um longdina av leigumálinum yvir fyri Tórshavnar kommunu, og hevur havnanevndin nú samtykt at leingja leigusáttmálan úr 20 upp í 25 ár.

Av tí at undanfarnu landsstýrini hava samtykt málið og sett tað í gongd, og at so nógvur peningur longu er nýttur, ella bindingar longu eru gjørdar, sum ikki sleppast undan, mælir meirlutin (Anfinn Kallsberg, Heini O. Heinesen, Jógvan Durhuus, Eilif Samuelsen, Flemming Mikkelsen og Jørgen Thomsen) løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Tordur Niclasen) tekur ikki undir við uppskotinum og hevur annars hesar viðmerkingar:

Undir 1. viðgerð undraðust fleiri tinglimir á mannagongdina í hesum máli. Víst varð eisini m.a. á projekteringskostnaðin upp á heilar 800.000 kr. og somuleiðis kostnaðin sjálvan av at innrætta umtalaðu hølir.

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini eru neyvari upplýsingar komnar fram, og er tað púra greitt, at tolleftirlitið, um tað skal flyta úr havnarskrivstovuni, hevur tørv á hóskandi umstøðum at arbeiða undir. Hinvegin er minnilutin av teirri áskoðan, at hesar umstøður kunnu fáast til vega á ein billigari og á ein meiri hóskiligan hátt, havandi landsins fíggjar- og búskaparligu støðu í huga.

Hóast meirilutin í fíggjarnevndini ásannar, at kostnaðurin av hesi innrætting er ógvuliga stórur, og at talan í veruleikanum bert er um eitt "bert betongrúm uttan vindeygu", so mælir hesin sami meiriluti kortini til, at uppskot lands-

stýrisins verður samtykt - við teirri grundgeving, at "so nógvur peningur longu er nýttur, ella bindingar longu gjørdar, sum ikki sleppast undan ..."

Søgan endurtekur seg!! Ivasamar, heimildarleysar íløgur verða gjørdar, fyri seinri at verða "legaliseraðar" við grundgevingum "at nú er komið so langt áleiðis ...". Og so verður rokningin send skattgjaldaranum!!

Her er tað, at landsstýrið hevur ábyrgdina, og ikki tollvaldið!

Minnilutin kann ikki góðtaka grundgeving meirilutans fyri at samtykkja uppskotið, og heldur tí í hesum føri, at hóast møguligt endurgjaldskrav fer at verða reist, so verður skattgjaldarin spardur fyri munandi útreiðslur, um gingið verður frá umtalaða projekti.

Hvat tilfarinum, ið longu er keypt, viðvíkur, kann hetta nýtast til aðrar almennar bygningar, sum krevja ábøtur ella verða seldar privatum.

Sostatt verður "tann mista íløgan" kr. 800.000 + eitt møguligt endurgjaldskrav, í staðin fyri tær 6,5 mió. kr. - sum helst vaksa til 8,0 mió. kr., tá avtornar, og er talan tó framvegis um høli, sum ikki eru ogn tolleftirlitsins.

Undir verandi umstøðum kann slík íløga ikki góðtakast, men eiga aðrar møguleikar heldur at verða troyttir fyri at veita tolleftirlitinum neyðugar umstøður at arbeiða undir. Her verður hugsað um at leiga eitt ávíst áramál - inntil fíggjar- og búskaparfortreytirnar fyri møguligari nýíløgu eru broyttar til tað betra.

Upplýst er í fíggjarnevndini, at havnarskrivstovan, har tolleftirlitið heldur til í 180 m² hølum, helst kemur at standa eini 5 - 10 ár aftrat, og er tað sostatt ikki bráðneyðugt at fáa nýggj høli til vega.

Men um so er, at havnarskrivstovan av eini ella aðrari orsøk í næstu framtíð skal rívast niður, so er neyðugt skjótast at finna onnur høli til endamálið.

Sostatt verður sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum innan góðkenda "leigurammu" at fáa til vega nóskandi høli í Tórshavn til tolleftirlitið.

FÍGGJARNEVNDIN, 31. januar 1990.

Anfinn Kallsberg Flemming Mikkelsen Jógvan Durhuus

Eilif Samuelsen Heine O. Heinesen Tordur Niclasen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 20. september 1989

F. L. j. nr. 1010-20-1
(at tiskala í svari)

Tlf. 11088 . Telex 81330 tinghs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, laygardag stongd.
KlH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 13/1989: Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensiónistar v.fl.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensiónistar v.fl.	lagtingslov om brændsels- ot kommunikationstilskud til visse pensionister m.fl.
§ 1. Í fíggjarárinum 1989 verður úr landskassanum veittur ein brenni- og samskiftisstudningur til pensiónistar við 2.200 kr. til hvønn pensiónist.	§ 1. I finansåret 1989 ydes af landskassen et brændsels- og kommunikationstilskud til pensionister på 2.200 kr. til hver pensionist.
§ 2. Brenni- og samskiftisstudningurin verður latin til fólk, ið áðrenn 1. september 1989 hava fingið játtaða fólkapensión, avlamispensión ella einkjupensión ella hava sent inn umsókn um slíka pensión, tí at rætturin til hana er uppnáddur, og seinri fáa pensiónina játtaða.	§ 2. Brændsels- og kommunikationstilskud ydes til personer, som inden den 1. september 1989 har fået bevilget folkpension, invalidepension eller enkepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og senere får pensionen bevilget.

§ 3. Treytin fyri at fáa brenni- og samskiftisstudning er, at pensiónisturin ikki hevur hægri ársinntoku út um pensiónina enn 80.000 kr. fyri hjún og 60.000 kr. fyri støk. Til grund fyri útrokningini verður løgd inntøkan, sum nýtt verður í sambandi við útrokning av pensiónini pr. 1. september 1989. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensiónistar, eiga ein part í felag.

§ 4. Í fíggjarárinum 1989 verður úr landskassanum eisini veittur ein brenni- og samskiftisstudningur við 2.200 kr. til fólk, sum tann 1. september 1989 fáa hjálp sambært § 13 í forsorgarlóginni, undir somu treytum sum fyrisett í § 3 í hesi lóg.

§ 5. Brenni- og samskiftisstudningurin verður útgoldin av Føroya Gjaldstovu.
Stk. 2. Annars hevur Almannastovan fyrisitingina av brenni- og samskiftisstudninginum um hendi.
Stk. 3. Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur skjótast

§ 3. Betingelsen for at få brændsels- og kommunikationstilskud er, at pensionisten ikke har højere årsindtægt udover pensionen end 80.000 kr. for ægtepar og 60.000 kr. for enlige. Til grund for beregningen lægges den indtægt, der anvendes i forbindelse med beregning af pensionen pr. 1. september 1989. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ 4. I finansåret 1989 ydes af landskassen også et brændsels- og kommunikationstilskud på 2.200 kr. til personer, der den 1. september 1989 modtager hjælp efter forsorgslovens § 13, på samme betingelser som fastsat i § 3 i denne lov.

§ 5. Brændsels- og kommunikationstilskuddet udbetales af Føroya Gjaldstova.
Stk. 2. Iøvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændsels- og kommunikationstilskuddet.
Stk. 3. Afgørelser, som Almannastovan har truffet, kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

inn fyri landsstýrið.

§ 6. Brenni- og samskiftisstudningurin er ikki skattskyldugur.	§ 6. Brændsels- og kommunikationstilskuddet er ikke skattepligtigt.
§ 7. Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.	§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Síðani 1980/81 hevur verið goldin brennistudningur til pensiónistar v.fl. sambært løgtingslóg, ið einans hevur havt gildi fyri viðkomandi fíggjarár.

Í 1988 var ein stuðul til lutvísa rindan av samskiftisútreiðslum sum fast telefongjald, sjónvarpsgjald og útvarpsgjald lagdur afturat brennistudninginum og í 1988 vóru 2.200 kr. veittar pensiónistum v.fl. í brenni- og samskiftisstudningi.

Landsstýrisins uppskot til løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning í 1989 er einsljóðandi við lógina fyri 1988.

Á fíggjarlógini 1989 eru settar 7.360.000 kr. av til brennistudning, og samsvarar hendan upphædd við mettu útreiðslurnar av uppskotinum.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/ Klaus Hermann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 13/1988 (evkating): Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensiónistar f.fl.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 20. september 1989 og eftir 1. viðgerð 26. september beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 28. september 1989, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

ALMANNA- OG HEILSUNEVNDIN, 28. september 1989.

Petur Reinert Flemming Mikkelsen Tógvan á Lakjuni

Jákup Lindenskov Niels Pauli Danielsen

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FRAMBURÐS- OG FISKIVINNUFLOKKURIN

Løgtingsmál nr. 14: Skúlaviðurskiftini í Vági.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at taka skúlamálið suðuri í Vági upp til nýggja viðgerð og loysa tað samsvarandi úrslitinum av tænastumannakanningini, niðurstøðuni hjá landsskúlaráðnum og løgfrøðingunum í Tinganesi.

Viðmerkingar:

Landsstýrið samtykti á fundi hin 11. september 1985 at seta í verk tænastumannakanning av viðurskiftunum í Vágs skúla.

Talan var um samarbeiðstrupulleikar millum nakrar av lærarunum og skúlastjóran.

Tá ið tænastumannakanningin hevði vart í 3 ár, og skúlin øll hesi 3 árini hevði koyrt væl, sum Landsskúlafyrisitingin eins og allir lærararnir siga frá í kanningini, verður skúlastjórin knappliga við 2 daga ávaring suspenderaður t.e. koyrdur fyribils úr starvi. Hetta hendi til skúlaársbyrjan 1988.

Hin 20. apríl 1989 sendi Allan Moltke-Hansen, forhoyrsleiðari, landsstýrinum niðurstøðu sína, sum fríkennir skúlastjóran og gevur lærarunum skuldina fyri samarbeiðstrupulleikarnar.

Landsskúlaráðið kom til tá niðurstøðu, at einki grundarlag er fyri at loysa Jákup Olsen úr starvi.

Tá somu niðurstøðu koma løgfrøðingar í Tinganesi til í meting frá 18. juli 1989, sum sigur: "Jákup Olsen kann ikki við

støði í tænastumannakanningini fáa ávaring, átalu ella sekt og kann ei heldur verða fluttur til annað arbeiðsstað ella loystur úr starvi. Náttúrligasta loysnin er tí, at suspensiónin av Jákupi Olsen verður sett úr gildi, og at hann byrjar aftur sum skúlastjóri 1. august 1989".

Skúlin í Vági byrjaði aftur eftir summarfrítíðina, uttan at suspensiónin var sett úr gildi, men landsstýrið samtykti á fundi hín 8. september 1989 at seta suspensiónina úr gildi og samtíðis mæla kenslumálaráðnum til at loysa Jákup Olsen úr starvi við pensión og endurgjaldi, meðan teir 13 lærararnir, sum tænastumannakanningin sigur hava skuldina av samarbeiðstrupulleikunum, sleppa við einari ávaring, ikki fyri samarbeiðstrupulleikar, men fyri at hava lagt arbeiðið niður í nakrar dagar.

Hetta tilmæli landsstýrisins hevur skelkað stóran part av fólkinum, og spurt verður, hvør meiningin er við kostnaðarmiklari rættarviðgerð, tá ið gjørt verður beint í móti niðurstøðuni. Menn ivast í rættartrygdini, serliga í tænastu- og arbeiðsmannaviðurskiftum, og tróvirði myndugleikanna.

Tí verður uppskot sett fram til samtyktar um, at landsstýrið tekur málið upp til viðgerð av nýggjum og roynir at finna eina loysn, sum samsvarar við niðurstøðuna í tænastumannakanningini og metingunum hjá landsskúlaráðnum og embætismonnunum í Tinganesi.

Á FØROYA LØGTINGI, 20. september 1989.

Niels Pauli Danielsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 14/1989: Skúlaviðurskiftini í Vági.

Málið er framlagt av Kristiliga fólkaflokkinum - Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkinum tann 20. september 1989 og eftir 1. viðgerð 26. september beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Durhuus, Poul Michelsen, Eilif Samuelsen og Marita Petersen) vísir á, at málið er avgreitt í landsstýrinum og setir sostatt einki uppskot fram.

Minnilutin (Tordur Niclasen) tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Sami minniluti hevur annars hesar viðmerkingar til málið:

Avgerðin, sum meirilutin í landsstýrinum hevur tikið í hesum máli, hevur vælskiljandi undrað mangan.

Her fyriliggur tú ein tænastumannakanning, hvørs úrslit ið hvussu so er, í minsta lagi, átti at verið vegleiðandi í politisku avgerðini. Men so hevur tíanverri ikki verið! Tí hóast tænastumannakanningin klárliga fríkennir skúlastjóran fyri verandi orsøk til samstarvstrupulleikar við Vágs skúla, so hevur landsstýrið gingið beint ímóti hesi óvildugu kanning!

Eftir at tænastumannakanningin var landsstýrinum í hendi, varð biðið um "juridiskt responsum" frá løgfrøðingum í landsstýrinum. Hetta var helst gjørt fyri at fáa ein "ikki politiskan instans" at gera óvildugar og kompotentar metingar.

18. juli 1989 fekk landsstýrið løgfrøðiligu metingina, har m.a. beinleiðis verður sagt:

> "Sum sæst, er úrslitið av tænastumannakanningini, at Jákup Olsen ikki hevur forbrotið seg móti skyldum sínum sum skúlastjóri og tænastumaður í ein slíkan mun, at hann hevur mist tað álit, sum inningin av starvinum krevur, ella sum gar tað vágaligt at lata hann halda fram í starvi sínum. Hetta ber í sær, at Jákup Olsen ikki kann fáa ávaring, átalu, sekt ella verða fluttur til annað arbeiðsstað ella loystur úr starvi."

Eftir allar vanligari mannagongd og rættarligum metingum átti landsstýrið nú haldgott grundarlag at tikið eina sakliga og rættvísa avgerð í hesum máli! Men her var eitthvørt, sum vigaði tyngri enn sakligheit, rættur og rættferð, tí sum kunnugt vórðu bæði tænastumannakanningin og løgfrøðiliga metingin skúgvað til viks!

Áðrenn avgerð landsstýrisins var kend, hevði samd tingmanning størsta samgonguflokk almannakunngjørt sína støðu til málið, nevniliga at "frikendur maður kann ikki avrættast". Hetta var greið tala - náttúrlig og vælskild av fólki í einum rættarsamfelagi. Tí undraði tað eisini, at tann minsti samgonguflokkurin orsakað hetta úttalilsi leikaði í sum óður og spenti politisku musklarnar soleiðis, at kreppa tók seg upp í samgonguni, sum m.a. førdi við sær, at viðgerðin av løgtingsfíggjarlógini varð munandi útsett.

Her kann ein av røttum loyva sær at spyrja, um hetta var eitt tekin um sakligan leik - ella eitt tekin um, at málið var so politiskt brunakent, at hesin minsti flokkur samgongunnar hevði sett sær sum mál, at málið skuldi loysast samsvarandi, og brýndi tí politiska knívin, sum síðan varð settur á barkan á hinum báðum samgonguflokkunum???!!

Úrslitið kenna vit! Teir, sum áður høvdu gjørt seg til talsmenn fyri rættartrygdini í samfelagnum boygnaðu sum strá í vindi og telvaðu við í hesum ódámliga leiki.

Fleiri vórðu sum kunnugt skelkað av avgerð landsstýrisins. Umframt lærarar við Vágs skúla, foreldrafelagið "Trivni" í Vági, hevur Føroya lærarafelag eisini gjørt vart við sína ónøgd. Í skrivi til Føroya landsstýri dagfest 8. september 1989 sigur lærarafelagið m.a.:

> "Lærarafelagið fer við hesum harðliga at mótmæla avgerð landsstýrisins at koyra tænastumann, sum er frífunnin við eina tænastumannakanning, úr starvi. Felagið kann ikki góðtaka, at tænastumaður verður loystur úr starvi, tá landsstýrið samstundis viðgongur, at hann ikki hevur forbrotið seg móti skyldum sínum sum tænastumaður og skúlastjóri, líka so lítið sum hann hevur mist tað álit, sum inningin av starvinum krevur ..."

Fyri at venda aftur til løgfrøðiligu metingina úr

landsstýrinum, verður víðari m.a. sagt:

> "Um landsstýrið, hóast úrslitið av kanningini, ynsir, at Jákup Olsen verður loystur úr starvi, eigur danska undirvísingarmálaráðið, sum hevur kompetancuna at loysa lærarar í fólkaskúlanum úr starvi uttan umsókn, beinanvegin at verða biðið um at avskediga Jákup Olsen diskretionært. Hetta er tó neyvan ráðiligt at gera, tá ein tænastumannakanning hevur verið ..."

Avgerð landsstýrisins er send undirvísingarmálaráðnum, og hevur Óli Breckmann, fólkatingsmaður í hesum sambandi sett kenslumálaráðharranum Bertel Haarder soljóðandi spurning:

> "Vil ministeren oplyse, om der i færøsk og/eller dansk lov, forvaltnings- eller retspraksis er hjemmel til uanmodet afskedigelse af en tjenestemand efter dennes frifindelæse i en tjenestemandssag?"

Vísandi til § 27, 1. pkt. í føroysku tænastumannalógini og § 28, 1. pkt. í "Lov om tjenestemænd i staten, folkeskolen og folkekirken" svarar Bertel Haarder, kenslumálaráðharri, at arbeiðsgevarin kann siga tænastumanni úr starvi, men tá talan er um eina varisliga uppsøgn, leggur hann afturat:

> "Der udkræves selvsagt, at sagligt grundlag for en sådan afgørelse ...."

Sakligt grundarlag fyri hesi uppsøgn finst ikki! Tí umframt tað, sum longu er víst á, lá frikennir skúlastjóran, eigur eisini at havast í huga, at undir truplum umstøðum hesi árini, tænastumannakanningin hevur vart, hevur skúlastjórin megnað at rikið skúlan, uttan at fingur kann setast á.

Stendur avgerð landsstýrisins við, so má við sorg ásannast, at rættartrygdin í føroyska samfelagnum hevur fingið ein dyggan smeit, og kemur ein at hugsa um støðuna í Suður/Mið amerikanskum londum, eins væl londum handan jarntjaldið, har valdið í monum føri er felagsnevnari fyri "rættvísum" avgerðum - ella, sagt á annan hátt, "tann, ið valdið hevur, fær altíð rætt!"

Er fyrst ein skriða lopin, er vandi fyri tí næstu.

Umráðandi er tí í einum rættarsamfelag, at skora væl undir lunnarnar og fyribyrgja, at støðið verður máað undan rættartrygdini hjá tí einstaka borgaranum.

Vísandi til omanfyristandandi tekur minnilutin undir við uppskotinum í vón um, at meiriluti á tingi ger tað sama.

RÆTTARNEVNDIN, 7. november 1989.

Jógvan Durhuus Marita Petersen Poul Michelsen

Tordur Niclasen Eilif Samuelsen

SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 15/1989: Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om skattemæssige afskrivninger m.m.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattligar avskrivingar v.m. við broytingum verða gjørdar hesar broytingar:	I lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.m. med ændringer foretages følgende ændringer:
1) Í § 20, 1. stk. verður "7%" broytt til: "5%".	1) I § 20, stk. 1 ændres "7%" til: "5%".
2) Í § 20, 2. stk. verður "4%" broytt til: "2%".	2) I § 20, stk. 2 ændres "4%" til: "2%".
§ 2.	§ 2.
Henda lóg fær gildi 1. januar 1990.	Denne lov træder i kraft 1. januar 1990.

Viðmerkingar:

Núgaldandi lóg um skattligar avskrivingar er frá 1971 við seinni broytingum. Tá lógin í sínu tíð varð sett í gildi, var hon sambært viðmerkingar til lógaruppskotið gjørd eftir útlendskum mynstri og tillagað føroyskum viðurskiftum.

Ásett varð tá m.a., at bygningar til handverk og íðnað kundu avskrivast við 6% av útvegannarpeninginum útvegannarárið og 9 næstkomandi inntøkuárini. Hvørt av fylgjandi inntøkuárum kundi skattliga avskrivingin verða gjørd við upp til 2% av útvegannarpeninginum. Fyri bygningar, har meiri enn 75% av gólvviddini varð nýtt vinnuliga, kundu 4% av útvegannarpeninginum avskrivast útvegannarárið og 9 næstkomandi inntøkuárini. Hvørt av fylgjandi inntøkuárum kundi skattliga avskrivingin verða gjørd við upp til 1% av útvegannarpeninginum. Skrivstovubygningar kundu als ikki avskrivast.

Hetta varð broytt í 1985 soleiðis, at bygningar til handverk og íðnað skuldu kunna avskrivast við 7% av útvegannarpeninginum útvegannarárið og næstkomandi inntøkuárini. Aðrir bygningar, herundir skrivstovu- og goymsiubygningar, skuldu kunna avskrivast við 4% av útvegannarpeninginum útvegannarárið og næstkomandi 9 inntøkuárini. Í báðum førum vóru avskrivingarprosentini aftan á nevnda áramál tey somu sum áður. At skrivstovubygningar eisini skuldu kunna avskrivast var grundað á, at nú skuldi søluvinningur eitt nú av bygningum til vinnulig endamál koma undir skattskyldu.

Men tá er ikki longur samsvar millum okkara og útlendskar avskrivingarreglur. Sambært galdandi danska lóggávu er avskrivingarprosentið fyri bygningar til handverk og íðnað alsamt 6 útvegannarárið og 9 næstkomandi inntøkuárini, og ikki er loyvt at avskriva bygningar, sum einans verða brúktir til skrivstovuvirksemi.

Fyriliggjandi lógaruppskot ásetir, at galdandi avskrivingarprosent útvegannarárið og 9 næstkomandi inntøkuárini lækka við 2%, meðan avskrivingarprosentini aftan á nevnda áramál eru óbroytt. Við at lækka avskrivingarprosentini verður niðað ímóti, at vinnan kemur at bera ein part av teim byrðum, sum í hesum tíðum verða lagdar á alt samfelagið. Rættari er helst at siga, at tann spardi skattur, ið stendst av avskrivingum, verður toygdur yvir eitt longri áramál.

Taka vit sum dømi ein skrivstovubygning, hvørs útvegannarpeningur er kr. 20 mió., so kann hann sambært galdandi reglur avskrivast við 4% upp til 10 fyrstu inntøkuárini, alla við kr. 800 túsund árliga. Til hetta svarar spardur skattur upp á kr. 392 túsund árliga.

Sambært Høgtíðindi nr. 2 frá juli 1989 var lántøkan í

teimum fýra realkreditstovnunum BRF, Nykredit, KD og IRF við ársenda 1987 komin upp á kr. 1.756 milj. Samhært upplýsing úr landsstýrinum er í 1988 givin tilsøgn um lán úr hesum kreditstovnum til eitt virði upp á kr. 535 milj., soleiðis at samlaða lántøkan í hesum stovnum við ársenda 1988 er komin upp á kr. 2.291 milj. Flestu av hesum lánum munnu standa í handils- og skrivstovubygningum. Meta vit, at samlaða iløgan í hendan partin av vinnuligum bygningum er tað tvífaldað, so vil ein lækking av avskrivingarprosentinum við 2 geva ein meirskatt upp á einar kr. 50 milj. ella o.u. tað sama, sum í 1989 verður tikið av nógv í tvingaðari uppsparing, samanber løgtingsmál nr. 16, løgtingslóg um afturbering av bundnari uppsparing.

Tað er ikki meir enn rímiligt, at tann partur av vinnuni, sum stendur fyri tí stóra vøkstrinum í okkara uttanlandsskuld, eisini er við til at bera ein part av byrðunum, nú tøkini skulu takast.

Á FØROYA LØGTINGI, 21. september 1989.

Lasse Klein

Tórbjørn Poulsen

A l i t

1

løgtingsmáli nr. 15/1989: Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.

Málið er framlagt av sjálvstýrisflokkinum tann 21. september 1989 og eftir 1. viðgerð 2. oktober beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Líkningarráð Føroya 25. oktober til tess at fáa lýstar ávísar tekniskar spurningar í uppskotinum í mun til galdandi lóg.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Jákup Lamhauge og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Atli P. Dam og Tórbjørn Poulsen) mælir til, at frá 1. januar 1990 verður talið 5% í pkt. 1 viðvíkjandi § 20, 1. stk. broytt til: 6% og frá 1. januar 1991 til: 5%, og viðvíkjandi § 20, 2. stk. ávikavist 3% í 1990, og frá 1. januar 1991 2%, og setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verður orðingin:	I § 1 formuleres
1) "Í § 20, 1. stk. verður frá 1.1.1990 "7%" broytt til: "6%" og frá 1.1. 1991 "6%" broytt til: "5%".	1) "I § 20, stk. 1 ændres fra 1.1.1990 "7%" til: "6%" og fra 1.1.1991 "6%" til: "5%".
2) Í § 20, 2. stk. verður frá 1.1.1990 "4%" broytt til: "3%" og frá 1.1. 1991 broytt til "2%".	2) I § 20, stk. 2 ændres fra 1.1.1990 "4%" til: "3%" og fra 1.1.1991 til "2%".

SKATTANEVNDIN, 31. oktober 1989.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 16/1989: Løgtingslóg um afturbering av bundnari uppsparing.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um afturbering av bundnari uppsparing.

§ 1. Tann parturin av bundnu uppsparingini, sum sambært løgtingslóg nr. 70 frá 3. juli 1989 stavar frá fyrru helvt av 1989, verður afturborin hvørjum einstøkum uppsparingar skattskyldaga.

§ 2. Upphæddin verður útgoldin straks ella í seinasta lagi 31. december 1989 við tilskrivaðum rentum.

§ 3. Rentan er tann til eina og hvørja tíð galdandi hægsta inniánsranta í førcyskum peningastovnum. Rentan er skattafrí.

lagtingslov om tilbagebetaling af bunden opsparing.

§ 1. Den del af den bundne opsparing, som i henhold til lagtingslov nr. 70 af 3. juli 1989, der hidrører fra første halvår av 1989, tilbagebetales ved enkelt opsparingsskat forpligtede.

§ 2. Beløbet udbetales omgående eller senest den 31. december 1989 tilligemed tilskrevne renter.

§ 3. Renten er den til enhver tid gældende højeste indskudsrente i færøske pengeinstitutter. Renten er fritaget for skat.

tingi, ið lóggeva við afturvirkandi megi. Tí eigur Føroya Løgting í framtíðini at verja seg fyri, at slíkt hendir aftur.

Uppskotið um bundna/tvingaða uppsparing hevur longu ført við sær ovurhondsstórt svart arbeiði, og sum av kønum fólki verður mett at koma upp á einar 600 milliónir í ár.

Uppskotið hevur eisini ført við sær, at stórar upphæddir, ið áttu at komið til skattingar í 1989, ikki verða útgoldnar, men at biðað verður at útgjalda tær til aftan á 1. januar 1990.

Eisini er tað komið fram, at fleiri familjur eru fluttar av landinum - og uppaftur fleiri umhugsa at flyta undan hesi eykabyrðu.

Hetta hevur tí eisini ført við sær, at stórar upphæddir ikki koma til skattingar í Føroyum. Mett verður, at upphæddirnar, sum ikki koma til skattingar, eru upp á umleið 200 milj. kr. higartil í ár, og at hetta tal kemur at vaksa við árs enda 1989, um ikki lógin um bundna tvingaða uppsparing verður broytt beinanvegin.

Sjálvstýrisflokkurin leggur tí hetta uppskot fram.

Verður fyriliggjandi lógaruppskot samtykt, missir landskassin eina inntøku uppá kr. 55 milj. Herða upphædd fæst inn aftur, verður lógarbroyting gjørd í lóg um skattligar avskrivingar. Sambært løgtingsmál nr. 15/1989, løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar.

Á FØROYA LØGTINGI, 21. september 1989.

Lasse Klein

Tórbjørn Poulsen

§ 4. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

§ 4. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Tá lð uppskotið um bundna/tvingaða uppsparing var til viðgerðar, boðaði sjálvstýrisflokkurin frá, at hann ikki kundi taka undir veið einum uppskoti, sum á nakran hátt broytti skattahámarkið, og kundi undir ongum umstøðum taka undir við, at lóggivið varð við afturvirkandi megi.

At lóggeva við afturvirkandi megi verður mett at verða størsta hóttanin móti vanligum rættarviðurskiftum. Ikki minst tí, at tey, slík lógaruppskot raka, longu hava avgjørt, hvussu tey skulu nýta sín pening.

Sum kunnugt verða nærum allir skattaborgarar landsins kravdir at gjalda til bundnu/tvingaðu uppsparingina frá 1. januar 1989 at rokna.

Hesin peningur er longu brúktur, og tí ber ikki til, at fólk skulu verða kravd eftir einari upphædd, sum tey longu hava tikið avgerð um, hvussu hon skal nýtast.

Av tí, at serstakliga sjónarmið Fólkaflokslns hava verið tey somu, og at teir alment hava gjørt vart við hetta bæði frá tingsins røðarapalli og í samband við valið 1988, meta vit, at teir við at atkvøða fyri uppskotinum um bundnu uppsparingina, eru lopnir frámav, og at teir nú hava fingið stundir at umhugsa illavorðnu gerð sína við at atkvøða fyri einum uppskoti, sum lóggevur við afturvirkandi megi.

Lógaruppskotið um bundna/tvingaða uppsparing hevur rakt føroyska skattaborgaran ógvuliga meint, serstakliga unga ættarliðið, sum frammanundan er hart spent við stórum lánum, og er nú orsakað av uppskotinum, ikki fært fyri at klára skyldur sínar.

Tað eru fleiri dømi um, at fólk, orsakað av lógini um bundna/tvingaða uppsparing, ongan pening hava eftir at liva fyri, og um stutta tíð, koma í ta støðu, at tey mugu fara frá húsi og heimi, og tí meta vit, at tað er í tøkum tíma, at lóg verður samtykt, sum forðar fyri, at lógin um bundna uppsparing fær gildi við afturvirkandi megi. Tað er skelkandi og ómoralskt, at uppskot yvirhøvur koma til viðgerðar á Føroya Løgtingi, íð

løgtingsmálí nr. 16/1989: Løgtingslóg um afturbering av bundnari uppsparing.

Málið er framlagt av Sjálvstýrisflokkinum tann 21. september 1989 og eftir 1. viðgerð 3. oktober beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Líkningarráð Føroya til tess at fáa lýstar ávísar tekniskar spurningar í uppskotinum í mun til galdandi lóg.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Jákup Lamhauge og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Tórbjørn Poulsen) tekur undir við uppskotinum.

Minnilutin (Atli P. Dam) tekur støðu í tingsalinum.

SKATTANEVNDIN, 31. oktober 1989.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 17/1989: Framhald av veðurtænastuni á flogvøllinum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp samráðingar við leiðsluni á flogvøllinum í Vágum (Statens Luftfartsvæsen) um at varðveita veðurtænastuna á flogvøllinum.

Viðmerkingar:

Seinastu 13 árini hevur veðurtænastan á flogvøllinum sent út veðurvánir fyri Føroya økið, og hevur hetta verið til stóra nyttu hjá teimum, sum skulu røkja sjógvin.

Fyri stuttum frættist, at hendan veðurtænasta skal niðurleggjast frá 1. november í ár.

Hetta verður til stóran ampa, serliga hjá teim smærru fiskiførunum, men sum heild er hetta eitt stórt afturstig fyri alla fiskivinnu og siglingg við Føroyar.

Landsstýrið hevur fyri langari tíð síðani fingið boð um hetta, og tykist sum tað er góðkent at niðurleggja hesa tænastu.

Tað má vera ein almenn uppgáva at røkja veðurtænastuna so væl sum yvirhøvur gjørligt. Hetta er eitt týðandi lið í trygdini á sjónum, eitt lið, sum ikki má takast úr tí samlaðu trygdartænastuni.

Tí verður hetta uppskot sett fram.

Á FØROYA LØGTINGI, 3. oktober 1989.

Henrik Old

løgtingsmáli nr. 17/1989: Framhald av veðurtænastuni á flogvøllinum.

Málið er framlagt av Henrik Old, løgtingsmanni, tann 3. oktober 1989 og eftir 1. viðgerð 5. oktober beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur til eftirtektar, at landsstýrið og fíggjarnevndin hava samtykt at halda fram við veðurtænastuni á flogvøllinum eitt hálvt ár fram. Fyri at ikki veðurtænastan skal verða niðurløgd, tá hetta hálva árið er farið, setir ein samd nevnd fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at veðurtænastan verður verandi við flogvøllin í Vágum.

FISKIVINNUNEVNDIN, 22. februar 1990.

Svend Aage Ellefsen — Suni Jacobsen — Petur Reinert

Jákup Lamhauge — Jógvan Durhuus — Henrik Old

Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

Tlf. 11080 . Telex 81310 tinget fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Afgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

3. oktober 1989

F. L. j. nr. (at tilskila í svari) 1426-5-5

JN/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 18/1989: veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri uttanlandsláni til Húsalánsgrunnin uppá 50 mió. kr. ella mótvirðið av hesi upphædd í fremmandum gjaldoyra.

§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om garanti for lån til Huslånefonden.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for udenlandslån til Húsalánsgrunnurin på 50 mio. kr. eller modværdien af nævnte beløb i udenlandsk valuta.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Í skrivi dagfestum 5. september 1989, søkti Húsalánsgrunnurin Foroya Landsstýri um loyvi at upptaka 50 mió. kr. í láni úr Union Bank of Norway International S.A. í Luxemburg. Vísandi til § 5 í lóg nr. 97 frá 1. november 1978 um Húsalánsgrunn við seinni broytingum samtykti landsstýrið á fundi hin 7. september 1989 at geva loyvi til omanfyri nevndu lántoku.

Í umsóknini varð einki nevnt um landskassaveðhald. Í skrivi dagfestum 29. september 1989 søkir Húsalánsgrunnurin landsstýrið um veðhald fyri lántekuni. Lógin um Húsalánsgrunnin gevur ikki landsstýrinum heimild til at veðhalda landskassans vegna fyri lánum til grunnin. Tess vegna er neyðugt við eini serligari løgtingslóg, sum gevur landsstýrinum heimild til landskassans vegna at veðhalda fyri láninum.

Nevnast kann, at landsstýrið sambært løgtingslóg nr. 45 frá 2. mai 1986 veðhelt fyri innan- ella uttanlandsláni til Húsalánsgrunnin uppá 40 mió. kr.

Landsstýrið mælir til at samsvarandi aftur verður samtykt í ár.

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður

/ Klaus Hermann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 18/1989: Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 3. oktober 1989 og eftir 1. viðgerð 5. oktober beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir tinginum til at samtykkja tað.

FÍGGJARNEVNDIN, 7. november 1989.

Anfinn Kallsberg Flemming Mikkelsen Heine O. Heinesen

Eilif Samuelsen Jørgen Thomsen Jógvan Durhuus

Tordur Niclasen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080. Telex 81310 tinghs fa. Telefax 14942. Posthox 64
Afgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

3. oktober 1989

F. L. j. nr. (at tilvísa í svari) 1509-3-5-2-1

AMF/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 19/1989: Tryggdargrunn til alivinnuna.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um tryggdargrunn til alivinnuna.

§ 1. Stovnsettur verður Tryggdargrunnur Alivinnunnar, sum skal veita endurgjald fyri tiltøk framd við heimild í § 1.

§ 2. Tá ið landsdjóralæknin eftir góðkenning frá landsstýrinum gevur boð um at fiskur, skeljadýr ella krabbadýr verða avlívað, kann endurgjald verða veitt úr Tryggdargrunni Alivinnunnar, tó bert har tryggingin ikki tekur við.

§ 3. Endurgjald verður ásett av trimum metingarmonnum, harav tveir verða tilnevndir av landsstýrinum og ein av alivinnuni. Tryggdargrunnur Alivinnunnar ber útreiðslurnar av virðismetingini.

§ 4. Eigarar av fiski, skeljadýrum og krabbadýrum, ið sjálvir hava verið atvoldin til, at fiskur er smittaður ella sjúkur, fáa ikki endurgjald frá Tryggdargrunni Alivinnunnar.

lagtingslov om Fiskeopdrætserhvervets garantifond.

§ 1. Der oprettes en Fiskeopdrætserhvervets Garantifond, som skal yde erstatning for foranstaltninger foretaget med hjemmel i § 1.

§ 2. Når landsdyrlægen efter landsstyrets godkendelse påbyder at fisk, skaldyr eller krebsdyr skal aflives, kan erstatning betales af Fiskeopdrætserhvervets Garantifond, dog kun hvor forsikringen ikke dækker.

§ 3. Erstatningen fastsættes af tre vurderingsmænd, hvoraf to udnævnes af landsstyret og en af fiskeoparæterhvervet. Fiskeopdrætserhvervets Garantifond afholder udgifterne af vurderingen.

§ 4. Ejere af fisk, skaldyr og krebsdyr, der selv har forvoldt, at fisk er blevet smittet eller syg, får ikke erstatning fra Fiskeopdrætserhvervets Garantifond.

§ 5. Fíggjarliga grundarlag grunsins er gjald frá alarum og árliga játtanin á løgtingsfíggjarlógini.

§ 6. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um virki grunsins íroknað uppkrevjingarhátt o.a.

§ 7. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 5. Fondens finansielle grundlag er bidrag fra opdrætterne og en årlig bevilling på lagtingsfinansloven.

§ 6. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler for fondens virksomhed, her iberegnet opkrævningsform m.v.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 23/1986: Uppskot til løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum varð skotið upp, at settur varð á stovn trygdargrunnur alivinnunnar.

Ein samd ídnaðarnevnd setti fram broytingaruppskot, har m.a. trygdargrunnurin varð broyttur til ein endurgjaldsgrunn, har fíggjarliga grundarlagið bert er játtan á fíggjarlogtingslógini.

Í samband við viðgerðina av uppskotinum um endurgjald í samband við furunkulosu (løgtingsmál nr. 107/1988) er gamla uppskotið um ein trygdargrunn tikið fram aftur, broytingaruppskotini, sum verða løgd fram, eru næstan óbroytt frá orðingini í uppskoti landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 28/1986. Einastu verunligu broytingarnar eru, at alivinnan oll nú ikki er umboðað av Havbúnaðarfelagnum, og tí er Havbúnaðarfelagið ikki nevnt í lógaruppskotinum, men í staðin er sett inn "alivinnan".

Onnur broyting er, at løgtingslóg um trygdargrunn í hesum uppskoti ikki er ein partur av løgtingslóg nr. 26 um sjúkur hjá fiski, krabbadýrum og skeljadýrum frá 30. apríl 1987, men ein sjálvstøðug l gtingslóg við hesum viðmerkingum:

Til §§ 1 og 2:
Trygdargrunnur verður settur á stovn og kemur hann at fíggja endurgjald til alarar fyri avlívaðan alifísk. Orð lógarinnar merkja, at grunnurin bert skal gjalda í teimum førum, har tryggingin sambært polisutreytunum ikki tekur við - tó soleiðis, at grunnurin ikki skal gjalda tað, ið svarar til sjálvsábyrgd alarans.

Um alari ikki hevur tryggjað fiskin, fær hann ikki endurgjald úr grunninum fyri tann partin av virðinum á fiskinum, ið hann eftir vanligum tryggingartreytum kundi fingið frá tryggingini. Ei heldur fær hann fyri upphædd, sum eftir vanligum tryggingartreytum skuldi verið roknað sum sjálvsábyrgd.

Til §§ 5 og 6:
Mett hevur verið, at rímiligt var, at bæði vinnan og landið átóku

sær fíggjarligar skyldur og byrðar, og verður býtið av skyldum og byrðum at fastseta í reglugerð, ið landsstýrið skal góðkenna.

Nevnast kann, at ymiskt er í okkara grannalondum, hvussu reglurnar fyri endurgjaldi eru. Í Danmark rindar staturin einsamallur endurgjald fyri virðið á tí avlívaða fiskinum, og í Noregi verður einki latið frá statinum. Fyriliggjandi uppskot hevur sostatt valt eina millumleysn.

Landsstýrið skjýtur upp, skjótt at fáa stovnsfæið í grunninum uppá uml. 4 mió. kr. og so heldur minka um veitingarnar á fíggjarlógunum framyvir.

Landsstýrið hugsar sær, at býtið millum aðrar, sum mugu hava fyrsta áhuga í trygdargrunninum og landsstýrið verður 50:50.

Um ásett verður eitt eyragjald í 1990 uppá 15 oyru/kg av seldum laksi og 10 oyru fyri hvørt selt smolt, kann roknast við, at alivinnan veitir grunninum millum 1,5 og 2 mió. kr., alt eftir framleiðsluni. Um landsstýrið setir 2 mió. kr. á fíggjarlógina til hetta endamál, verða veittar grunninum uml. 4 mió. kr. í 1990.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/

Kjartan Hoydal

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11080 . Telex 81310 dingata fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. leygardag stongt

3. oktober 1989

F. L. j. nr. 1509-3-5-2-1

AMF/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 20/1989: Broyting í løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987 um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 7 verða stk. 3, 4, 5 og 6 strikað. Stk. 7 verður stk. 3.
2) § 8 verður strikað.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om sygdomme hos fisk, skaldyr og krebsdyr.

§ 1.

I lagtingslov nr. 26 af 30. april 1987 om sygdomme hos fisk, skaldyr og krebsdyr foretages følgende ændringer:

1) I § 7 udgår stk. 3, 4, 5 og 6. Stk. 7 bliver stk. 3.
2) § 8 udgår.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjord.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Vísst verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 19/1989: Trygdargrunn til alivinnuna.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/ Kjartan Hoydal

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 5. oktober 1989

F. L. j. nr.
(er tilskála í sendi)

Tlf. 11040 . Telex 81310 flagna fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. laygardag stongt
AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 21/1989: Yvirtøka av Færøernes Realkreditinstitut.

I.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at taka ímóti "Færøernes Realkreditinstitut" sum føroyskt sermál.

II.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í lóg "om Færøernes Realkreditinstitut".

§ 1.

Í lóg nr. 60 frá 12. mars 1955 "om Færøernes Realkreditinstitut" verða gjørdar hesar broytingar:

lagtingslov om ændring i lov om Færøernes Realkreditinstitut.

§ 1.

I lov nr. 60 af 12. marts 1955 om Færøernes Realkreditinstitut foretages følgende ændringer:

1) Í § 3, § 4, stk. 1, § 6, stk. 1, § 7, stk. 2 og 4, § 10, stk. 5 og 6 og § 19 verður "statsministeriet og" strikað.
2) Í § 4, stk. 1 verður "1 udpeges af statsministeriet, 1 af Færøernes Landsstyre og 1 af Danmarks Nationalbank" broytt til: "sum landsstýrið tilnevnir".
3) Í § 5, stk. 1 verður "10" broytt til: "8" og orðini "2 udpeges af folketinget" ganga út.
4) § 8 verður strikað.
5) Í § 19 gongur út "to af henholdsvis statsministeriet og landsstyret antagne revisorer samt af".
6) Í § 21, stk. 2 verður "statsministeriet" broytt til: "landsstýrið".

1) I § 3, § 4, stk. 1, § 6, stk. 1, § 7, stk. 2 og 4, § 10, stk. 5 og 6 og § 19 udgår "statsministeriet og".
2) I § 4, stk. 1 ændres "1 udpeges af statsministeriet, 1 af Færøernes Landsstyre og 1 af Danmarks Nationalbank" til: "som landsstyret udpeger".
3) I § 5, stk. 1 ændres "10" til: "8" og ordene "2 udpeges af folketinget" udgår.
4) § 8 ophæves.
5) I § 19 udgår "to af henholdsvis statsministeriet og landsstyret antagne revisorer samt af".
6) I § 21, stk. 2 ændres "statsministeriet" til: "landsstyret".

§ 2.

Landsstýrið ásetir, nær lógin kemur í gildi.

§ 2.

Landsstyret fastsætter tidspunktet for lovens ikrafttræden.

<u>Viðmerkingar:</u>

Á fundi 15. februar 1989 samtykti landsstýrið at yvirtaka Føroya Realkreditstovn og fyrireika yvirtøkuna.

Ríkismálaráðið hevur um ríkisumboðið heitt á Føroya Landsstýri um skjótast gjørligt at taka stig til, at Føroya Realkreditstovnur verður yvirtikin sum sermál sambært heimastýrislógini

litra A, pkt. 15. Henda áheitan er ein liður í avbureaukratiserings- og privatiseringsætlanunum hjá donsku stjórnini. Landsstýrið hevur frá ríkisumboðnum fingið at vita, at ríkismálaráðið og tjóðbankin hava váttað, at yvirtøka ikki fer at broyta higartil galdandi skipan viðvíkjandi ríkisábyrgd fyri lánum við panti í fiskiførum ella tað, at tjóðbankin keypir obligatiónir stovnsins.

Landsstýrið hevur gjørt uppskot til lógarbroyting, soleiðis at heimildir og skyldur ríkismálaráðsins, tjóðbankans og fólkatingsins verða strikaðar, og í staðin álagdar landsstýrinum einsamalt. Harafturat hevur landsstýrið mett, at tað er nóg mikið, at roknskapurin verður grannskoðaður av 1 grannskoðara valdur av stýrinum í staðin fyri sum higartil, at ein hevur verið valdur av ríkismálaráðnum, 1 av landsstýrinum og 1 av stýrinum.

Gildiskoma lógarinnar er ikki ásett, tí landsstýrið er av teirri áskoðan, at ríkismálaráðið eigur at fáa boð um samtyktina og at dagurin verður settur í samráð við ríkismálaráðið.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja yvirtøkuna og broytingarnar í lógini um "Færøernes Realkreditinstitut".

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

Jálgrim Hilduberg

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 5. oktober 1989

F. L. j. nr. 1907-4-4
(at tilskrive i svar)

Tlf. 11080 . Telex 81310 tlagus fa . Telefax 14941 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15. leygardag stongt
EJ/or

Løgtingsmál nr. 22/1989: Broyting í løgtingslóg um Postverk Føroya.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Figgjar-, rakstar- og íløguætlan fyri postverkið verður gjørd á hvørjum ári og latin landsstýrinum."

2) § 17 verður orðað soleiðis:
"Stk. 1. Landsstýrið ásetir í samráð við figgjarnevndina postgjøldini fyri: Brævsendingar við tilskrift, pakkar í Føroyum, bløð og tíðarrit.
Stk. 2. Postverkið ásetir onnur postgjøld.
Stk. 3. Miðað verður ímóti, at gjøldini verða ásett samsvarandi handilsligum sjónarmiðum."

3) § 20 verður orðað soleiðis:
"Postverkið gevur kvittan fyri móttøku av innskrivaðum sendingum, pakkum, sendingum við virðistilskilan og peningasendingum."

4) § 23 verður orðað soleiðis:
"Postverkið skal krevja

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 17 af 31. marts 1976 om Færøernes Postvæsen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 17 af 31. marts 1976 om Færøernes Postvæsen foretages følgende ændringer:

1) § 5, stk. 2 affattes således:
"Finans-, drifts- og anlægsbudget for postvæsenet udfærdiges hvert år og indsendes til landsstyret."

2) § 17 affattes således:
"Stk. 1. Landsstyret fastsætter i samråd med finansudvalget posttaksterne for: Brevforsendelser med tilskrift, pakker på Færøerne, aviser og tidskrifter."
Stk. 2. Postvæsenet fastsætter alle andre posttakster.
Stk. 3. Det skal tilstræbes, at taksterne fastsættes efter forretningsmæssige principper."

3) § 20 affattes således:
"Postvæsenet kvitterer for indlevering af rekommanderede forsendelser, pakker, forsendelser med angiven værdi og pengeforsendelser."

4) § 23 affattes således:
Postvæsenet skal kræve

váttan fyri útflýgging av innskrivaðum sendingum og sendingum við virðisttilskilan og fyri útgjalding av peningi."

5) § 29 verður orðað soleiðis:
"Stk. 1. Um ein innskrivað brævasending er horvin, verður veitt endurgjald, ið verður ásett av postverkinum.
Stk. 2. Um ein innskrivað brævasending er skadd, ella innihald hennara fult ella lutvist er farið fyri skeyti, verður skaðin endurgoldin, tó ikki út um upphæddina, ið latin verður fyri horvna innskrivaða sending.
Stk. 3. Fyri ein innskrivaðan pakka, sum er horvin ella skaddur, verður skaðin endurgoldin, tó í mesta lagi ein upphædd, ið verður ásett av postverkinum."

6) § 30, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Fyri ein vanligan pakka, sum er horvin ella skaddur, ella hvørs innihald fult ella lutvíst er farið fyri skeyti, verður skaðin endurgoldin, tó í mesta lagi ein upphædd, ið verður ásett av postverkinum."

7) § 31, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Postverkið hevur ábyrgdina av sendum peningi sambært postávísing og postgiro, til peningurin er rætt latin móttakaranum."

8) § 32 verður orðað soleiðis:
"Um ein snarsending verður seinkað meira enn 6 tímar vegna dráil frá postverkinum, verður tað tapið, sum hetta hevur volt, endurgoldið við eini upphædd, ið verður ásett av postverkinum."

9) § 41 verður orðað soleiðis:
"Endurgjaldsskylda post-

kvittering for udlevering av rekommanderede forsendelser og forsendelser med angiven værdi samt for udbetaling af beløb."

5) § 29 affattes således:
"Stk. 1. Hvis en rekommanderet brevforsendelse er botkommet, ydes der en godtgørelse, som fastsættes af postvæsenet.
Stk. 2. Hvis en rekommanderet brevforsendelse er blevet beskadiget, eller dens indhold helt eller delvis er gået tabt, erstattes skaden, dog ikke ud over et beløb, som ydes for en bortkommet rekommanderet brevforsendelse.
Stk. 3. For rekommanderede pakker, som er bortkommet eller beskadiget, erstattes skaden, dog højst et beløb, som fastsættes af postvæsenet."

6) § 30, stk. 1 affattes således:
"For en almindelig pakke, der er bortkommet eller beskadiget, eller hvis indhold helt eller delvis er gået tabt, erstattes skaden, dog højst et beløb, som fastsættes af postvæsenet."

7) § 31, stk. 1 affattes således:
"Postvæsenet er ansvarligt for indbetalte beløb efter postanvisning og postgiro, indtil beløbet er rigtigt fremkommet til modtageren."

8) § 32 affattes således:
"Hvis en ekspresforsendelse forsinkes mere end 6 timer på grund af forsømmelse fra postvæsenets side, erstattes det tab, der derved er forvoldt med et beløb, som postvæsenet fastsætter."

9) § 41 affattes således:
"Postvæsenets erstatningspligt ophører, når kravet ikke er anmeldt for postvæsenet inden et år efter

verksins endar, tá ið kravið ikki er fráboðað postverkinum innan 1 ár eftir, at sendingin er latin inn, viðvíkjandi postávísingum og postgirosendingum tó innan 2 ár eftir, at peningurin er inngoldin."

forsendelsens indlevering, for postanvisninger og postgiroforsendelser dog inden 2 år efter, at beløbet er indbetalt."

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:
Løgtingslóg um postverk Føroya hevur nú verið í gildi í góð 13 ár. Higartil eru ongar broytingar gjørdar í lógini og kann hetta takast sum tekin um, at lógin hevur virkað eftir ætlan. Postverkið hevur gjørt landsstýrið varugt við, at tíðin nú er komin til at gera smærri dagføringar, so orðalagið í lógini svarar til tær broytingar, sum menningin á postøkinum hevur havt við sær hesi 13 árini.

Viðvíkjandi broytingunum í § 17 er at viðmerkja, at sum er skulu øll gjøld ásetast av landsstýrinum. Í roynd um verður hetta ikki gjørt, tí tað hevði verið eitt størri arbeiði, um øll gjøld til útlond skuldu verið fyriløgd landsstýrinum til ásetingar. Tey flestu av teimum gjøldum, ið nú verða fyriløgd landsstýrinum, hava lítlan fíggjarligan týdning, og skotið verður tí upp, at gjøldini, ið skulu ásetast av landsstýrinum, verða nevnd í lógini.

Hvat broytingunum í § 29, 30 og 32 viðvíkur er at siga, at í 1976, tá føroyska postlógin varð skrivað, stóðu allar endurgjaldsupphæddirnar hjá danska postverkinum í postlógini. Hesar upphæddir verða í Danmark nú ásettar av postfyrisitingini av praktiskum ávum. Landsstýrið heldur, at Postverk Føroya framyvir eigur at hava heimild til at áseta hesar upphæddir.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/

Eyðfinnur Jacobsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 22/1989: Broyting í løgtingslóg um Postverk Føroya.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 5. oktober 1989 og eftir 1. viðgerð 18. oktober beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 27. oktober. Fíggjarnevndin hevur serliga viðgjørt petti 2 í viðmerkingunum frá landsstýrinum viðvíkjandi uppskotinu broytingini av § 17 í løgtingslóg nr. 17 frá 21. mars 1976 um Postverk Føroya.

Fíggjarnevnd er av teirri áskoðan, at tá talan er um millumtjóða gjøld, verða hesi at áseta av postverkinum sjálvum í tráð við ta praksis, ið her er galdandi á millumtjóða støði, og at onnur gjøld verða at áseta av landsstýrinum í samráð við fíggjarnevndina, og setir ein samd fíggjarnevnd tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1, 2) § 17 verður orðað soleiðis:
"Stk. 1. Postverkið ásetir millumtjóða postgjøld.
Stk. 2. Øll onnur postgjøld verða ásett av landsstýrinum í samráð við fíggjarnevndina.
Stk. 3. Miðað verður ímóti, at gjøldini verða ásett samsvarandi handilsligum sjónarmiðum."

I § 1, 2) § 17 formuleres således:
"Stk. 1. Posvæsenet fastsætter internationale posttakster.
Stk. 2. Alle andre posttakster fastsættes af landsstyret i samråd med finansudvalget.
Stk. 3. Det skal tilstræbes, at taksterne fastsættes efter forretningsmæssige principper."

FÍGGJARNEVNDIN, 31. oktober 1989.

Anfinn Kallsberg — Heini O. Heinesen — Jógvan Durhuus

Flemming Mikkelsen — Eilif Samuelsen — Jørgen Thomsen

Tordur Niclasen

Á L I T

í

løgtingsmáli nr. 23./1989: Landsstýrismál.

U P P S K O T

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 4. august 1988 til 27. juli 1989.

Ein minniluti (Hergeir Nielsen) hevur hesar viðmerkingar:

Gerðabók landsstýrisins varð býtt út til flokkarnar á løgtingsfundi tann 17. oktober 1989 og beind í landsstýrismálanevndina.

Gerðabókin fevnir yvir tvinni landsstýrisskifti og trinni landsstýri við 15 ymiskum landsstýrisfólkum. Tann 18. jan. 1989 leggur javnaðarflokkurin frá sær og fólkaflokkurin kemur í staðin fyri í tað nýggja landsstýrið. Nývaldað landsstýrið hevur sín fyrsta fund dagin eftir.

Næsta landsstyrisskiftið fer fram tann 22. juni 1989, tá ið gamla sjálvstýrið leggur frá sær, og kemur sambandsflokkurin í staðin fyri í tað nýggja landsstýrið, sum verður skipað millum fólkaflokkin, sambandsflokkin og tjóðveldisflokkin. Fyri fyrstu ferð síðani heimastýrislógin kom í gildi, verður eitt landsstýrið skipað við 6 landsstýrismonnum, men manna við 7.

Hóast eingin av teimum trimum flokkunum, sum skipa landsstýris-samgongu, vil vita av kristilig fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki, so fer hann kortini ikki úr landsstýrinum við tað fyrsta, men hevur landsstýrismannin (Tord Niclasen) sitandi ein krákumánaða eftir at landsstýrið er skipað. Landsstýrismaðurin situr ongantíð á fundi, og ikki verður upplýst, hvar hann situr í staðin fyri. Frá 26. juni til 1. august, tá ið landsstýrismaðurin (Tordur Niclasen) sigur seg úr starvi, virkar hann sostatt ikki sum landsstýrismaður.

Bara hetta stutta ævintýrið kostaði landskassanum 32.983,63 kr., sum má haldast at vera ein ókristiliga stór upphædd fyri einki at gera í ein heilan mánaða.

Allir landsstýrismenn, ið sita á fundum landsstýrisins, eiga at undirskriva gerðabókina. Tíverri kemur fyri av og á, at henda skipan ikki verður hildin. Tað er ikki upplýst, hví so er.

6. mai 1988 samtykkir landsstýrið at søkja fíggjarnevndina um eina eykajáttan upp á 2.445.000 Finskar Markar., ið skulu nýtast til keyp av teldustýrdum ferðaseðlatólum frá finsku fyritøkuni Buscom. Fíggjarnevndin viðgerð málið 2. juni 1988. og samtykkir ikki at játta keypið av hesum tólum.

Hóast eingin heimild er, so undirskrivar landsstýrismaðurin hjá gamla sjálvstýrinum, (Lassi Klein), hetta keyp við finsku fyritøkuna í mánaða aftan á, at fíggjarnevndin avvisir keypsætlanini. Keypsupphæddin er umí. 6 mió. kr., og er peningurin seinni játtaður finnlendingum, eina mest tí at tað í millumtíðа samstarvi ikki ber til at lata ein landsstýrismann sløða navn sítt undir útlendskar keypssáttmálar, uttan at tað samfelag, sum hevur ábyrgdina av sama landsstýrismanni, heftir fyri tað. Í hesum førinum tekur landsstýrismaðurin 6 mió. kr. úr landskassanum, uttan at kassaheimild er fyri teimum.

Hóast keypið fer fram í heimildarloysi, og hóast landsstýrismaðurin hjá gamla sjálvstýrinum sendir fjølmentan ferðahóp eystur til Finlands at nema sær kunnleika um framkomnu tøknifrøðina innan teldustýrd ferðaseðlatól, so er einki av teimum tikið í nytslu enn. nú tvey ár eru farin, síðani ólógliga keypið fór fram.

29. september 1988 samtykkir landsstýrið at taka upp lán stórt 4.500.000 Sfr, umí. 23,2 mió. kr., til millumbylgjusendaran í Akrabergi. Løgtingið hevur samtykt lántøkuna eftir einum mettum kostnaði upp á 50,6 mió. kr. Hetta er í mai mánaði 1988, og vist verður á, at hetta er triggjar ferðir so nógv, sum upprunaliga ætla, uttan at hoyrilíkindini batna stórvegis.

Fyribilskostnaðurin í dag er um 70 mió. kr. Goldnar eru 42 mió. kr., og søkt verður um 16 mió. kr. sum eykajáttan frá fíggjarnevndini fyri fíggjarárið 1990. Raksturin verður mettur til 2 mió. kr. árliga, og sendarin hoyrist hvørki í Danmark, Noregi, Skotlandi ella í Íslandi. Á fjarfiskileiðunum, ið eftiri eru við New Foundland, Svalbard, Eystur- og Norðsjónum eru vituliga heldur eingi hoyrilíkindi. 200 kW sendari røkkur fáar fjórðingar longur enn 50 kW sendari, men er munandi dýrari í keypi og rakstri.

Atla P. Dam og Sólbirni Jacobsen verður hendan lántøkan litin upp í hendi at avgreiða.

Lántøkutreytirnar frammanundan hesari um lán stórt 93,3 mió. kr. frá apríl 1986 vóru m.a soljóðandi:

I Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at syrgja fyri, at skipað verður serstøk figgjardeild við egnum figgjarstjóra á Telefonverki Føroya Løgtings.

25 fólkavaldir løgtingsmenn samtyktu uppskoti. Samtyktin er ikki hildin.

Harafturat samtyktu 23 av teimum fólkavaldu soljóðandi:

II Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna iløguætlanina og teknisku framstigini so gjølla, so hvørt tey verða framd. Til hetta arbeiðið setir landsstýrið 3-mannanevnd, ið hevur tekniskt og figgjarligt innlit.

Hendan samtyktin er heldur ikki hildin.

Afturat hesum løgtingssamtyktunum treytaði figgjarnevnd Føroya Løgtings sær í álitinum, at landsstýrismaðurin í telefonmálum hjá

gamla sjálvstýrinum (Lassi Klein) hvørt hálva árið skuldi geva fíggjarnevnd løgtingsins frágreiðing um gongdina yvirhøvur bæði tekniskt og fíggjarliga. Men har fekst tó ongantíð nakað samband.

Hendan treytin er sostatt heldur ikki hildin.

Málið sæst ikki at hava fingið nakrar avleiðingar, hvørki fyri Lassa Klein, landsstýrismann úr gamla sjálvstýrinum ella fyri fíggjarnevnd Føroya Løgtings.

Meðan javnaðarflokkurin umsat alivinnuna var vanliga manna-gongdin hon, at alibrúkini fingu landsstýrisins loyvið til veðhald og lán úr menningargrunninum til 1., 2. og 3. rakstrarárið, og í onkrum føri eisini ískoytisjáttan til 3. rakstrarárið. Ikki siggjast nakrar treytir rakstrinum viðvikjandi verða settar av landsstýrinum í sambandi við veðhalds- og lánveitingarnar, sum í hesum gerða-bókartíðarskeiði koma upp móti 6 mió. kr. til einstakt alibrúk.

3. okt. 1988 verður lýst lóg sum ásetur, at :"Lán upp á meiri enn 2 mió. kr. ella veðhald av lánum upp á meira enn 3 mió. kr. til einstakt virki krevur góðkenning frá landsstýrinum." Tá tær flestu heimildirnar frá landsstýrinum til menningargrunnin um láns- og veðhaldsveitingar liggja innanfyri hesar treytir sæst ikki í gerðabókini framyvir í hvussu stóran mun, og á hvønn hátt, tá menningargrunnurin tekur lut í alivinnuni.

Menningargrunnurin hevur higartil lænt alivinnuni umleið 180 mió. kr.

Í sambandi við hesa lógarheimildina verður løgtingið kunnað um, at tilevnað er kunngerð um viðtøkur fyri menningargrunnin. Í kunngerðini, sum er dagfest tann 31. mars 1989, stendur m.a. í § 4, Stk. 5, at dagliga umsitingin av grunninum liggur hjá stjóranum, sum verður tilnevndur av landsstýrinum eftir tilmæli frá nevndini.

Stjórastarvið í menningargrunninum er ikki lýst leyst, og eingin stjóri er settur á landsstýrisfundi.

Á fundi tann 7. oktober 1988, verður avgjørt í sambandi við eina studnings- og veðhaldsumsókn til kryvjihús at bíða eftir eini heildarætlan hesum viðvikjandi frá aliráðnum.

3 vikur seinni játtar landsstýrið 30% veðhald uttan nærri tilmæli frá aliráðnum, sum samtykt er at bíða eftir. Tónaðargrunnurin mælir frá. Menningargrunnurin mælir frá. Menningarstovan mælir frá. Seinast nevnda mælir frá, visandi til, at virkið ikki fer at bera

seg, og at tað ikki fer at gagna arbeiðsorkuni í økinum, ti at sama virksemið verður spjatt á 3 - 4 virki í sama øki, har eingin fær nógmikið. Menningarstovan kostar landskassanum 2 mió. kr. árliga, hon hevur rætt í sínum metingum, og tað fyrsta vikrkið í hesum øki fer undir hamaran 31. mai 1990.

Menningarstovan leggur harafturat stórsta dentin á, at landsstýrið ikki eigur at stuðla virkjum, hvørki beinleiðis ella við veðhaldi, uttan so at kostnaðurin av reinsing er tikin við í metingina, um virkið hevur møguleikar at bera seg. Hildið verður, at færri virkini eru, íð fáa løggilding sum sløðingar- og kryvjivirki til alifisk, lættari verður at fremja krøv um reinsing.

Í gerðabók landsstýrisins frá 9. februar 1989 (fó.-, tj.- gl. sj.- k. f. F.f.f) siggja vit, at flokkarnir taka seg sundur í sambandi við viðgerðina av løgtingslógaruppskotinum um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

Tjóðveldisflokkurin, sum m.a. umsitur figgjarmál, mælir til, at samgongan nú fer undir at beina veðhaldsstreymin burtur frá landskassanum, og at ábyrgdin, herundir vinningur og hall, verður løgd á vinnulívið og fíggingarstovnarnar.

Í gerðabók landsstýrisins frá hesum fundi siggja vit, at uppskotið til løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir verður samtykt av fólkaflokkinum, gamla sjálvstýrinum og kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki), meðan tjóðveldisflokkurin (Finnbogi Ísakson og Signar Hansen) hevur hesar viðmerkingar:

"Í umleið 30 ár eru viðurskiftini millum tað almenna (serliga landskassan) og vinnulívið tvinnað meira og meira saman við veðhaldum fyri kreppulánum til skip og virki, við serlánum, byggi- og rakstrarstudningi og veðhaldum.

Tjóðveldisflokkurin heldur, at henda gongd hevur verið óheppin fyri vinnulívið, tað almenna og samfelagið sum heild, og at roynt eigur at verða at fáa greiðari viðurskifti millum alment og privat, m.a. soleiðis at vinnulívið hevur ábyrgdina av sær sjálvum í mest møguliga mun og eigur vinningin, tá íð vinningur er, og ber tapið, tá tap er.

Fyri at røkka hesum máli er neyðugt at halda uppat við teimum fløktu ognar- og rakstrarviðurskiftunum. Eitt stig á leiðini - av mongum stigum - er at lata vera við at endurnýggja lógina um alment veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

Landsstýrismenn tjóðveldisfloksins skilja eisini samgonguskjali millum verandi 4 samgonguflokkar soleiðis, at henda leið eigur at vera hildin, og teir kunnu tí ikki mæla til, at lógin um kreppuveðhald verður endurnýggjað."

Fólkaflokkurin (Anfinn Kalsberg) ásannar, at tað privata vinnulívið og tað almenna eru saman tvinnað. Tað er tó eingin loysn at avtaka tær sokallaðu "loftingarlógirnar".

Gera vit tað sum støðan hjá vinnuni er nú, so fáa vit massafalittir, sum koma at geva okkara samfelag eitt sera stórt bakkast.

Tí má arbeiðast langsiktað at fáa møguleikarnar hjá vinnuni at klára seg sjálva, og tá tað er nátt, kann møguliga avtøka av "loftingarlógini" koma upp á tal, men ikki fyrr enn fyritreytirnar eru til staðar."

Smærru flokkarnir høvdu onga viðmerking til gerðabókina um hetta mál.

Hóast einki lán er tikið, so verður ein heimildarlóg til eina lántøku upp á 200 mió. kr. hildin at vera nóg mikið til, at fari verður undir stórstu føroysku verkætlanina nakrantíð, t.e. undirsjóartunnilin undir Vestmannasundi valárið 1988. Í skrivi frá 8. juni 1988 boðar landsverkfrøðingurin frá 3 valkostum fyri hesi verkætlan. Samskipanarbólkurin hevur fund um máliið 8. juli 1988, og mælir til valkost III, sum kostar 195 mió. kr. fyri tunnilin og 25 mió. kr. fyri vegaføringina, ella tilsamans 220 mió. kr.

Munnliga verður sama dag, og skrivliga eina viku seinni, boðað landsverkfrøðinginum frá, at farast skal undir verkætlan III, sum er ein undirsjóartunnil fyri 220 mió. kr. Hendan stórsta verkætlanin hjá føroyingum higartil verður ikki viðgjørd og enn minni samtykt á landsstýrisfundi.

30. juni 1988 boðar landsverkfrøðingurin landsstýrinum frá, at tað koma at resta um 70 mió. kr. í at fáa endarnar at røkka saman fyri árið 1988. Hetta er áðrenn nøkur króna er nýtt til undirsjóartunnilin.

Góðar 20 mió. kr. verða nýttar í 1988 og góðar 20 mió. kr. nýttar í 1989 til undirsjóartunnilin. Eingin játtan er á fíggjarlógini, og eingin landsstýrissamtykt er fyri at fara undir verkætlanina. Tað er gamla sjálvstýrið, sum umsitur samferðslumál hetta tíðarskeiðið.

Ein minniluti (Óli Breckmann) førir fram, at fyrri partur av gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 4. august 1988 til 13. januar 1989 er merktur av, at løgtingsval er 8. november, og hareftir at tásitandi landsstýri skal fara frá.

Landsstýrisfundirnir bera merki av, at stórt trýst liggur á samgonguni um at játta pening til alskyns, skilagóð sum ivasom endamál. Stórar upphæddir verða játtaðar til eitt nú skúlabyggingar, keyp og leigu av hølum til verandi og nýggjar almennar stovnar. Bygdar-, frítíðar- og ítróttarfeløg verða dúgliga leskað við tilsamans miljóna upphæddum.

Serliga eyðsýnt munagóðar og nógvar eru tær peningaupphæddir, sum landsstýrið játtar í studningum, lánum, góðkenning av almennum grunnalánum og veðhaldum til stovnsetan, útbygging, marknaðarføring, reyndarframleiðslu og kunstigan andadrátt til skip og vinnuvirki, hóast hesin almenni peningur upp á forhond má roknast burturspiltur.

Í fleiri førum er talan um politisk íspunnin skálkaskjól og als ikki verulig vinnuvirki. Persónarnir aftanfyri hava hvørki frammanundan ella eftirsíðan kunnað vist á sítt sjálvfiggjaða virksemi, men koma sær fram einans sum kandidatar í stemmufiskaríi fyri skattgjaldarans rokning.

Tíggjutals miljónir skola aftur og fram millum landskassa og sandkassaprojekt, ið ongan lívrætt høvdu átt, um farið var fram við politiskari ábyrgd av skattgjaldaranna peningi, sum Tinganes fær lítið upp í hendi í trúnaði at umsita.

Miljónir verða játtaðar til svartkjaftaroyndir til ávís útvald skip, sum longu vóru deyðadømd, tí tey vórðu bygd av politiskum heldur enn vinnuligum orsøkum.

Blue North fær tvær ferðir játtaðar miljónir í veðhaldi og eykafíggjan eftir stuttari tíð, hóast virkið frá byrjan var ein planøkonomiskur sandkassi, og peningurin eyðvitað ikki fekst aftur.

Eitt roykivirki í Porkeri fær miljónir játtaðar, hóast tað var meir enn ivasamt, um virkið nakrantið kom í gongd.

Miljónir verða játtaðar til umbygging av einum framm-

anundan vónleysa dýrum og fallerøðum "Suðringi".

Tá likviditetur landskassans út á summarið er uppturkaður, samtykkir landsstýrið at læna 150 mió. kr. til at halda eina politiskt úthungraða fiskivinnu gangandi.

70 miljónir krónur verða játtaðar eyka til málsøkið hjá Lassa Klein, landsstýrismanni, at byggja vegir og tunlar fyri, hóast hetta málsøkið helst hevur verið yvirtrekt (við árslok við 120 mió. kr.). Játtanin verður tikin av býtinum av "avlopi landskassans" frá árinum fyri, hóast landskassin hevði um 200 mió. kr. í nettohalli í 1988.

Tá størv skulu setast, frangongur av gerðabók landsstýrisins, at kampatkvøðurnar um persónarnar til størvini hava verið politiskar heldur enn fakligar.

Góða viku fyri løgtingsvalið játtar landsstýrið slakar 20 mió. kr. til 3. byggistig til sjómansskúlan, hóast sama landsstýrið júst frammanundan hevði beint fyri endamálinum og grundarlagnum undir hægru sjómansskúlaútbúgvingini, nevniliga farmaflotanum.

Gerðabók landsstýrisins fyrsta hálva árið, eftir at nýggj samgonga var skipað á tingi, og nýtt landsstýri valt, ber merki av peningatroti í landskassanum sum úrslit av teymaleysu almennu nýtsluni frammanundan. Nýggja landsstýrið noyðist at útseta, kanna nærri og avvisa hópir av umsóknum bæði frá almennum stovnum og leivdunum av tí politiskt íbirta sonevnda "vinnulívi", sum síðan er horvið saman við undanfarnu samgongu.

Nýggja landsstýrið tekur upp trotabúgvini, sum undanfarna hevði hildið kunstiga á lívi í mánaðir, t.d. Blue North, Skála Skipasmiðju, Vágs Skipasmiðju, Nordafar og hópin av neyðstøddum skipum. Støðutøka til effektiv veðhald og ráðaloysi um játtaðan upphøggingarstuðul av undanfarna landsstýri eftir ónýtiligari lóggávu merkja landsstýrisfundir í stóran mun.

Ásannandi, at gerðabókin er forvitnisligt, søguligt skjalatilfar fyri komandi søgugranskarar yvir eina politiskt og búskaparliga øra tíð við ábyrgdarloysi teirra ráðandi sum

felagsnevndara, mælir minnilutin tinginum til at góðkenna gerðabókina, sum hóast alt tykist vera juridisk og formelt rætt førd.

Ein annar minniluti (Vilhelm Johannesen) vísir á, at hendan gerðabókin fevnir um eitt sermerkt og á mangan hátt marghættligt tíðarskeið í føroyskum politikki.

Í november 1988 høvdu vit regluligt løgtingsval. Eftir valið vóru samráðingar um skipan av nýggjari samgongu. Politiska gongdin síðani tá bendir á, at hesar samráðingar ongatíð eru loknar og valla verða tað, fyrr enn fólkið hevur talað av nýggjum.

18. januar 1989 varð sagt, at ein samgonga var skipað millum fólkaflokkin, tjóðveldisflokkin, sjálvstýrisflokkin og kristiliga fólkaflokkin. Í øllum førum varð eitt nýtt landsstýri valt tann dagin. Men her gekst ikki matari enn hjá kellingini á sinni - gleðin var stokkut. Livitíðin var bert fýra mánaðir.

24. juni sama ár varð aftur boðað frá nýggjari samgongu. Hesa ferð vóru tað fólkaflokkurin, tjóðveldisflokkurin og sambandsflokkurin, ið høvdu funnið saman. Annar av teimum smáu flokkunum, sjálvstýrisflokkurin, hevði valt at fara úr samgonguni og hin, kristiligi fólkaflokkurin, varð rikin á dyr. Nevnda dag var landsstýrið umskipað soleiðis, at tveir triðingar av landsstýrismanningini, varð útskift.

Hóast hetta hendi eingin broyting til tað betra. Tann skeiva gongdin helt fram. Í fyrstani varð tosað um ávísar tíðarfestar politiskar kreppur. Tosað varð um jólakreppur, páskakreppur, hvítusunnukreppur, hásummarkreppur, javndøgurskreppur o.s.fr. Men hetta er ikki soleiðis longur. Nú er øllum greitt, at tann politiska kreppan er permanent - hon er alla tíðina og verður ongatíð loyst.

Hesa tíðina - frá januar 1989 til dagin í dag - hevur løgtingsarbeiðið verið heilt óvanligt og sera óregluligt. Fyrr gjørdu vit mun á ólavsøkutingsetu, vetrartingsetu og eykating-

setum. Í dag ber ikki til at gera nakran mun. Eingin veit, nær tað er ólavøkuting, vetrarting ella eykating. Løgtingið er snøgt sagt saman alt árið.

Tað óregluliga við løgtingsarbeiðinum finna vit í tí, at stóran part av árinum er bara ein tingfundur um vikuna, men so koma herindini. Hesi koma, tá samgongan onkuntíð er samd. Tá skal tingið til arbeiðis, um tað so er í úrtíð. Seinasta summar sat løgtingið á fundi sjálvan jóansøkudag. Fíggjarlógin fyri 1990 varð avgreidd á tingi náttina til 31. december 1989. So her er talan um heilt nýggj fyribrigdi - nevniliga jóansøkuting og jólating.

Tað seinasta nýggja á hesum øki er, at tingformaðurin seinasta týsdag boðaði frá, at løgtingssetan, sum byrjaði á ólavsøku 1989, skal enda seinast í hesi vikuni. Formaðurin segði, at løgtingið fór ikki at halda fund hósdagin (Kristi himmalsfaradag), men legði aftrat, at starvsfólkini á løgtingsskrivstovuni skuldu til arbeiðis hendan halgidagin.

Eitt landsstýri og ein samgonga, sum ikki megna at stíla fyri og leggja løgtingsarbeiðið frægari til rættis, megna sjálvandi heldur ikki at stýra landinum. Minnilutin er greiður yvir, at føroyingar yvirhøvur ynskja hetta landsstýrið og hesa samgonguna, har sum piparið grør. Í øllum øðrum demokratiskum londum, vildi eitt stýri sum hetta, tikið avleiðingarnar av tí politiska dugnaloysinum við at lagt frá sær og útskrivað nýval.

Men eisini her kemur orku- og viljaloysið til sjóndar. Hóast eitt higartil ókent politiskt evnaloysi, ráða- og atgerðarloysi, so vilja landsstýrið og samgongan sita víðari. Út frá hesum heldur minnilutin, at eitt uppskot um nýval her og nú, er til fánýtis og verður tí ikki sett fram. Vit mugu bara siggja í eyguni, at vit koma at liva í politiskum ótryggleika higar til landsstýrið og samgongan hava viðgingið sína egnu ómegn og leggja frá sær.

Minnilutin torir hóast alt at vóna, at hetta hendir um ikki alt ov langa tíð, og at hetta tíðarskeiðið fer at ávara føroyingar ímóti aftur at geva fólkaflokkinum leiðsluna av føroyska samfelagnum. Hetta hava vit vónandi lært, men samstundis mugu vit ásanna, at hetta var ein dýrur lærupeningur.

Minnilutin kennir ikki trongd til at biðja tingið rópa hurrá fyri landsstýrisins gerðabók - serliga ikki tí partinum, sum umfatar tíðarskeiðið frá 18. januar til 27. juli 1989. Men hinvegin sæð hava hesir fundir verið, og avgerðirnar eru tiknar. Hóast minnilutin ikki er samdur í fleiri av teimum avgerðum, sum tiknar eru, so mælir minnilutin løgtinginum til at taka gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 4. august 1988 til 27. juli 1989 til eftirtektar.

LANDSSTÝRISMÁLANEVNDIN, 22. mai 1990.

Hergeir Nielsen Óli Breckmann Vilhelm Johannesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 17. oktober 1989

Tlf. 11080 . Telex 81310 tingms fi . Telefax 14042 . Postboks 64
Skrivstovutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

F. L. j. nr.
(at ubskila í svari)

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 24/1989: Broyting í løgtingslóg um bundna uppsparing.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bundna uppsparing.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 70 frá 3. juli 1989 um bundna uppsparing verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýggj § 1, stk. 3 verður sett:
"Verður persónur 65 ár í einum inntøkuári, fellur uppsparingarskyldan burtur frá 1. januar í hesum árinum."

2) § 4, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Uppsparingin fyri 1989 verður tó av landsstýrinum í seinasta lagi 1. juli 1992, rentað við 5% p.a., sett inn á bundna konto sum ein serlig eftirlønarskipan, og verður peningurin útgoldin eigaranum, tá hann verður 65 ár, tó í fyrsta lagi aftaná 8. juli 1990, við deyða ella gjaldstrot. Afturgjalding fer annars fram, tá ið 4 ár eru farin eftir at skattskyldan helt uppat."

lagtingslov om ændring i lagtingslov om bunden opsparing.

§ 1.

I lagtingslov nr. 70 af 3. juli 1989 om bunden opsparing foretages følgende ændringer:

1) Som ny § 1, stk. 3 indsættes:
"Hvis en person bliver 65 år i et indkomstår, bortfalder opsparingspligten fra 1. januar i dette år."

2) § 4, stk. 2 affattes således:
"Opsparingen for 1989 skal dog af landsstyret senest 1. juli 1992, forrentet 5% p.a., indsættes på bunden konto som en særlig pensionsordning, og beløbet skal udbetales ejeren, når han bliver 65 år, dog tidligst efter 8. juli 1990, ved død eller konkurs. Tilbagebetaling finder ellers sted, da 4 år er gået efter at skattepligten bortfaldt."

3) I § 4, stk. 3 indsættes som nyt 2. punktum:
"Tilbagebetaling finder ellers sted, da den opp-

3) Í § 4, stk. 3 verður sett sum nýtt 2. punktum:
"Afturgjalding fer annars fram, tá ið tann uppsparingarskyldugi verður 65 ár, kemur í gjaldstrot ella doyr."

4) § 4, stk. 4 verður strikað.

5) Sum nýggj § 6, stk. 2 verður sett:
"Landsstýrið fær heimild til at áseta reglur, sum skulu tryggja, at persónar ikki kunnu flyta útrokningargrundarlagið fyri bundnu uppsparingina frá einum til annað inntøkuár."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Reglan í § 1, nr. 1) er tó galdandi fyri persónar, ið verða 65 ár aftaná 31. desember 1989.

sparingspligtige bliver 65 år, går konkurs eller afgår ved døden."

4) § 4, stk. 4 udgår.

5) Som ny § 6, stk. 2 indsættes:
"Landsstyret bemyndiges til at fastsætte regler, som skal sikre, at personer ikke kan overføre beregningsgrundlaget for den bundne opsparing fra et til andet indkomstår."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelsen. Bestemmelsen i § 1, nr. 1) er dog gældende for personer, som bliver 65 år efter 31. december 1989."

Viðmerkingar:

1) Galdandi regla í § 1 ásetir, at allir persónar undir fullari skattskyldu, hava uppsparingarskyldu uttan aldursmark uppeftir. Fyri at fáa samsvar ímillum uppsparingarskyldu og afturgjalding hjá persónum, sum eru 65 ár, verður skotið upp, at uppsparingarskyldan ikki verður galdandi fyri persónar, sum verða 65 ár í einum inntøkuári. Verður persónur 65 ár í einum inntøkuári, t.d. 7. juli 1991, fellur ippsparingarskyldan burtur frá 1. januar 1991. Við tað at 65 ára gamlir persónar hava goldið inn bundna uppsparing í 1989, verður mælt til við gildi frá 1. januar 1990, at hesir verða frítiknir fyri uppsparingarskyldu.

2) Meginreglan er, at uppsparingin verður afturgoldin saman við tilskrivaðum rentum fjórða árið, sbr. § 4, stk. 1, § 4, stk. 2, er ein serregla, sum bert er galdandi fyri 1989, hareftir uppsparingin ikki kann útgjaldast fyrr enn persónurin verður 65 ár. Eftir galdandi reglum hava persónar yvir 65 ár og sum hava skyldu til at gjalda inn í 1989 ikki rætt at fáa henda pening útgoldnan fyrr enn eitt ár eftir at galdandi lóg kom í gildi, t.v.s. aftaná 8. juli 1990 og er henda broyting ein nágreining av galdandi reglu.

í § 4, stk. 2, síðsta punktum er gjørd tann broyting, at afturgjalding av uppsparing fyri 1989 kann fara fram, tá ið 4 ár eru farin, eftir at skattskyldan helt uppat. Við hesum skulu persónar, hvørs skattskylda til Føroyar er hildin uppat,

bíða í 4 ár fyri at fáa uppsparingina fyri 1989 aftur.

3) Broytingin er bert ein nágreining av galdandi reglu.

4) § 4, stk. 4 verður strikað vegna broytingarnar í stk. 2 og 3.

5) Landsstýrið fær heimild til at gera reglur til tess at tryggja, at persónar ikki skulu kunna flyta inntøkur frá einum inntøkuári til annað inntøkuár.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/
Jalgrim Hilduberg

løgtingsmáli nr. 24/1989: Broyting í løgtingslóg um bundna uppsparing.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 17. oktober 1989 og eftir 1. viðgerð 19. oktober beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Likningarráð Føroya til tess at fáa lýstar ávísar tekniskar spurningar í uppskotinum í mun til galdandi lóg.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Jákup Lamhauge, Heini O. Heinesen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Törbjørn Poulsen) var í móti lógini um tvingaða uppsparing, tá hon var til viðgerðar í tinginum mánaðarskiftið juni/juli í ár.

Fleiri orsøkir vóru til hesa støðu minnilutans:

1. Lógin hevur afturvirkandi kraft.
2. Hon setir 50% skattaloftið til síðis.
3. Hon rakar eisini lág- og meðalinntøkur.

At samgongan so skjótt, aftan á at lógin er sett í gildi, kemur við uppskoti um at broyta lógina, gevur orsøk til at halda, at lógin fekk ikki nóg holla viðgerð, men var skundað ígjøgnum tingið.

Fyriliggjandi lógaruppskot, eins og løgtingsmál nr. 16/1989: Løgtingslóg um afturbering av bundnari uppsparing, lagt fram á ting av Sjálvstýrisflokkinum og tingmál nr. 27/1989: Løgtingslóg um útgjalding av bundnari samansparing til rentur og avdráttir fyri sethús, lagt fram av kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur, er ein roynd til at bøta um ringastu avleiðingarnar av lógini um bundnu uppsparingina.

Minnilutin tekur undir við einum hvørjum uppskoti, sum

ber á brá at lætta um hjá teimum, sum eru komin illa fyri, orsakað av lógini um bundna uppsparing, í hesum føri við at sleppa teimum omman fyri 65 ár undan at verða rakt av lógini. Sostatt tekur minnilutin undir við uppskotinum frá landsstýrinum, sum viðger tey 65-ára gomlu, t.e. § 1, stk. 1 til og við 4.

Ein annar minniluti (Atli P. Dam) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

SKATTANEVNDIN, 31. oktober 1989.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080 . Telex 81310 lings fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Kvørkisstuttið: Kl. 10—15. Leygardag stongt

17. oktober 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari)

Løgtingsmál nr. 25/1989: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.
Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum, verður henda broyting gjørd:
Í § 3, stk. 2 verður 4. punktum orðað soleiðis:
"Fyri lesandi og lærlingar uttanlands, sum áðrenn lestur ella læru hava havt fastan bústað í Føroyum í minst 4 ár, sbr. § 1, nr. 3) í samtíðarskattalógini, verður persónsfrádrátturin frá og við inntøkuárinum 1989, 6.000 kr."

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó verður § 1 galdandi fyri inntøkur frá 1. januar 1989 at rokna.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.
I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændring:
I § 3, stk. 2 affattes 4. punktum således:
"For studerende og lærlinge udenlands, der inden studierne eller læren har haft fast bopæl på Færøerne i mindst 4 år, jfr. § 1, nr. 3) i kildeskatteloven, bliver personsfradraget fra og med indkomståret 1989, 6.000 kr."

§ 2.
Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen, dog gælder § 1 for indtægter fra 1. januar 1989 at regne.

Viðmerkingar:

Broytingin í hesi lóg er ein nágreining av broyttu reglunum um lesandi og lærlingar uttanlands, sum frá og við 1. januar 1989

verða fult skattskyldug í Føroyum og soleiðis, at hesir persónar fáa ein persónsfrádrátt uppá 6.000 kr. Við hesi broyting verður samsvar millum tað, sum ætlanin var við teimum broytingum, gjørdar vórðu í § 1, nr. 3) í samtíðarskattalógini og § 3, stk. 2 í ásetingarlógini við løgtingslógunum nr. 33 og nr. 34, báðar frá 20. apríl 1989.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/
Jalgrim Hilduberg

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 25/1989: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 17. oktober 1989 og eftir 1. viðgerð 26. oktober beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd tinginum til at samtykka uppskot landsstýrisins.

SKATTANEVNDIN, 12. december 1989.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 18. oktober 1989

F. L. j. nr. 1320-1
(at tilskila í svari)

TIf. 11980 . Telex 81310 tingms fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

JN/or

Løgtingsmál nr. 26/1989: Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om garantifond for fiskeindhandlinger og løn m.v.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. verður aftaná § 7 sett sum nýggj § 7 a:

"Landsstýrið hevur landskassans vegna heimild til at veðhalda fyri rakstrarláni til grunnin."

§ 1.

I lagtingslov nr. 68 af 9. juni 1988 om garantifond for fiskeindhandlinger og løn m.v. indsættes efter § 7 som ny § 7 a:

"Landsstyret er beføjet til på landskassens vegne at kautionere for driftslån til fonden."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Trygdargrunnurin fyri avreiðingar og lønir v.m. hevur vent sær til landsstýrið við spurninginum um gjaldføri grunsins. Krøvini móti grunninum hava verið so mikið stór, at grunnurin í dag ikki er førur fyri at rinda tað, sum honum er álagt sambært lógini.

Ógoldnu krøvini móti grunninum eru í løtuni 1,3 mió. kr.

Til tess at grunnurin skal kunna sleppa undan gjaldføristrupulleikum nú og í framtíðini, skjýtur landsstýrið upp, at landsstýrið landskassans vegna fær heimild til at veðhalda fyri rakstrarláni til grunnin.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/

Klaus Hermann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 26/1989: Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 18. oktober 1989 og eftir 1. viðgerð 26. oktober beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og í hesum sambandi innkallað Regin Thomsen, sum vegna Líkningarráð Føroya umsitur trygdargrunnin.

Upprunaliga var grunnurin trygdargrunnur veiðimanna, men frá 1. januar 1987 víðkaður til eisini at gælda fyri hýru og løntakarar. Krøvini til grunnin síðani 1. januar 1987 til d.d. hava verið umleið 7,3 mió. kr., harav grunnurin í dag skyldar uml. 1,3 mió. kr.

Inntøkurnar til grunnin eru gjald upp á 1 o/oo av øllum útgoldnum A-inntøkum, sum arbeiðsgevari skal gjalda.

Inntøka til grunnin higartil er hendan:

Yvirtøka av stovnsfæ trygdargrunns veiðimanna	2,8 mió. kr.
Inntøka í 1989 (o/oo av A-inntøku í 1988)	4,0 - -.

Av hesum er inniløgan í grunninum uml. 100.000 kr., og útistandandi eru uml. 700.000 kr.

Ógoldin krøv móti grunninum eru uml. 1,3 mió. kr.

Undir 1. viðgerð vóru tingmenn ivasamir um at geva landsstýrinum heimild at veðhalda óavmarkað fyri rakstrarláni, bæði í upphædd og í áramáli, nevndin mælir tí til avmarkingar.

Nevndin hevur eisini viðgjørt inntøkugrundarlagið til grunnin, sum gevur grunninum uml. 4 mió. kr. árliga. Nevndin er samd um, at henda inntøka er í minna lagi, um krøvini framhaldandi verða so stór til grunnin, sum tey hava verið í 1988 og 89. Umhugsað eigur tí at vera, um gjaldið skal hækkast úr 1 o/oo upp í 1½ o/oo. Hendan spurning eigur landsstýrið at taka upp.

Frá Føroya landsstýri hevur fíggjarnevndin fingið áheitan um at broyta lógartekstin í § 2, og út frá tí, ið fört

er fram, setir ein samd fíggjarnevnd í staðin fyri uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

u p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygdargrunn við avreiðingar og lønir v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. verða hesar broytingar gjørdar:

1) Í § 2, 1. stk., verður: "(Konkurslov nr. 293 af 8. juni 1977)" broytt til: "(Kongelig anordning nr. 183 af 15. marts 1989 om ikrafttræden for Færøerne af konkursloven - Bekendtgørelse af Konkursloven nr. 444 af 28. august 1984)".

2) Aftan á § 7 verður sett sum nýggj § 7 a: "Landsstýrið hevur landskassans vegna heimild til at veðhalda fyri rakstrarláni upp til 1,5 mió. kr. til grunnin. Hetta veðhald er í gildi frá 1. januar 1990 til 1. april 1991."

lagtingslov om ændring at lagtingslov om garantifond for fiskeindhandlinger og løn m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 68 af 9. juni om garantifond for fiskeindhandlinger og løn m.v. foretages følgende ændringer:

1) I § 2, stk. 1 ændres: "(Konkurslov nr. 293 af 8. juni 1977)" til: "(Kongelig anordning nr. 183 af 15. marts 1989 om ikrafttræden for Færøerne af konkursloven - Bekendtgørelse af konkursloven nr. 444 af 28. august 1984)".

2) Efter § 7 indsættes som ny § 7 a: "Landsstyret er beføjet til på landskassens vegne at garantere for driftslån op til 1,5 mio. kr. til fonden. Denne garanti har gyldighed fra 1. januar 1990 til 1. april 1991."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

FÍGGJARNEVNDIN, 5. desember 1989.

Anfinn Kallsberg Flemming Mikkelsen Heine O. Heinesen

Zilif Samuelsen Jørgen Thomsen Jógvan Durhuus

Tordur Niclasen

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURÐS- OG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 27/1989: Løgtingslóg um útgjalding av bundnari samansparin til rentur og avdráttir fyri sethús.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um útgjalding av bundnari samansparing til rentur og avdráttir fyri sethús.

§ 1. Persónur, sum hevur goldið inn til bundna samansparing eftir løgtingslóg nr. 70 frá 3. juli 1989, fær samansparingina útgoldna til at rinda falnar rentur og avdráttir av lánum til sethús í Húsalánsgrunninum og peningsstovnunum.

§ 2. Útgjaldingin fer fram hvørt hálvár 1. apríl og 1. oktober.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

lagtingslov om udbetaling af bunden opsparing til renter og afdrag for beboelseshuse.

§ 1. En person, som har indbetalt til bunden opsparing i henhold til lagtingslov nr. 70 af 3. juli 1989, får opsparingen udbetalt til at betale forfaldne renter og afdrag af lån til beboelseshuse i Húsalánsgrunnurin og pengeinstitutterne.

§ 2. Udbetalingen sker hvert halvår 1. april og 1. oktober.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendgørelse.

Viðmerkingar:

Tá ið lógin um bundna samansparing í summar var til viðgerðar og samtykt, gjørdu vit í Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki, vart við, at vit vóru ímóti lógini í tí líki, hon var sett fram, tí at hon var afturvirkandi, sprongdi 50%-skattamarkið og rakti lág- og meðalinntøkurnar so meint. Harumframt skulu fólk bíða til pensjónsaldur, áðrenn tey fáa samansparingina fyri 1989 útgoldna, og síðani fýra ár fyri 1990 og árini aftaná.

Hetta, mettu vit, kunna fáa avleiðingar, sum eingin her á landi vil, og gera tað trupult fyri aðrar samansparingar. Serliga illa komu tey fyri, sum hava sett seg í stóra skuld fyri at útvega sær og sínum tak yvir høvdið, og sum eru noydd til at arbeiða nógv og tí hava góða inntøku. Tey høvdu roknað við at greitt skyldurnar og hildið gjørdar avtalur, áðrenn lógin um bundnu samansparingina kom, ið fær samtíðarskattaskipanina at afturhalda upp til 2/3 av lønarútgjaldingini. Nøkur teirra eru tí nú í vanda fyri at missa hús og heim, sum tey hava spart upp til, og lagt mestu orku í, tí at peningsstovnarnir kunnu ikki steðga við rentum og avdráttum, tá ið eisini teir hava sítt at svara til.

Sethús má sigast vera ein samansparing í sær sjálvum, sum Føroya Løgting hevur samtykt at styðja væl, og tað má tí haldast vera rímiligt, at bundna samansparingin eftir løgtingslóg nr. 70 frá 3. juli í ár verður nýtt til at gjalda falna rentu og falnar avdráttir hjá teimum, sum annars standa fyri at missa hús sín. Tað kann ikki vera rætt, at fólk skulu noyðast av við húsini fyri at tryggja sær aldurdómin og nakrar krónur aftrat um fýra ár. Tí verður hetta uppskot sett fram at bøta um nakrar av teimum ringastu avleiðingunum av inntøkulógunum í summar.

Á FØROYA LØGTINGI, 19. oktober 1989.

Niels Pauli Danielsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 27/1989: Løgtingslóg um útgjalding av bundnari samansparing til rentur og avdráttir fyra sethús.

Málið er framlagt av Kristiligа Fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 19. oktober 1989 og eftir 1. viðgerð 31. oktober beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Jákup Lamhauge og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Atli P. Dam og Tórbjørn Poulsen) tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

SKATTANEVNDIN, 12. december 1989.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 25. oktober 1989

F. L. j. nr.
Fat tilskila i svarini

Tlf. 12000 . Telex 81310 finpas fo . Telefax 14042 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15. laygardan stongt
AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 28/1989: Broyting í løgtingslóg um gjald av vinningi við burturluting.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um gjald av vinningi við burturluting.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 11 frá 9. apríl 1968 um gjald av vinningi við burturluting v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 2 verða "500 kr." broyttar til: "3.000 kr."
2) Í § 2 verða "4 vikur" broyttar til: "14 dagar". og orðini "tørvandi frágreiðing í tveimum eintøkum" verða broytt til: "váttaða frágreiðing".

lagtingslov om ændring i lagtingslov om afgift af gevinst ved bortlodning.

§ 1.

I lagtingslov nr. 11 af 9. april 1968 om afgift af gevinst ved bortlodning m.v. foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 2 ændres "500 kr." til: "3.000 kr."
2) I § 2 ændres "4 uger" til: "14 dage" og ordene "de oplysninger i to eksemplarer, der er nødvendige" ændres til: "bekræftet redegørelse".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Í 1968 varð ásett, at í staðin fyri inntøkuskatt av vinningi við burturluting skuldi latast 15% gjald til landið av hvørjum vinningi, sum hevði meira virði enn 500 kr.

Landsstýrið hevur mett, at virðið uppá 500 kr. er ov lágt sett, og fer ein hækking til 3.000 kr. at svara nøkunlunda til tað, sum upphæddin varð sett til í 1968. Hækkingin fer at lætta munandi um umsitingina.

Gjaldstovan hevur mælt til, at 4 viku freistin til rindan av gjaldinum verður broytt, so at freistirnar í § 2 fyri rindan av gjaldinum og innlating av frágreiðing verða tær somu, tá hetta er meira einfalt at umsita.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/

Jalgrim Hilduberg

Á l á t

á

løgtingsmáli nr. 28/1989: Broyting í løgtingslóg um gjald av vinningi við burturluting.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 26. oktober 1989 og eftir 1. viðgerð 31. oktober beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd tinginum til at samtykka uppskot landsstýrisins.

SKATTANEVNDIN, 12. december 1989.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 29/1989: Umboð føroyinga í fólkatinginum.

U p p s k o t

til

samtyktar.

Løgtingið heitir á dohsku stjórnina, tá grundlógin verður endurskoðað, at skipa so fyri, at tað stendur føroyingum frítt um og hvussu okkara umboð í fólkatinginum skulu veljast.

Viðmerkingar:

Sambært § 29 í grundlógini skulu vit føroyingar velja tvey umboð í fólkatingið. Sambært § 31 skulu hesi okkara umboð veljast við fólkaatkvøðu. Sama er galdandi fyri grønlendsku umboðini. Men meðan tað sambært somu grein við lóg kunnu ásetast serligar reglur um val av teim grønlendsku umboðunum, so er hetta ikki galdandi fyri føroysku umboðini.

Seinru árini hevur spurningurin um at broyta grundlógina alt tíðari tikið seg upp í Danmark, og møguleiki er nú fyri, at málið kemur upp í fólkatinginum. Orsøkirnar eru fleiri, men mest mar tað vera reglan um, at forsætismálaráðharrin kann skriva út nýval í ótíð, sum ávísir politikarar vilja hava broytta. Seinast hevur nývaldi formaður fólkatingsins, H. P. Clausen, boðað frá, at hann er sinnaður at virka fyri grundlógarbroyting.

Spurningurin um okkara umboð í fólkatinginum hevur verið til viðgerðar í løgtinginum áður.

Í 1965 legði táverandi løgmaður uppskot á ting um at gera broytingar í heimastýrislógini, sum m.a. bóru í sær, at

okkara umboð í fólkatinginum skuldu takast av. Uppskotið fekk ikki undirtøku.

Í 1973 legði Sjálvstýrisflokkurin uppskot á ting um at seta á stovn føroyska umboðsstovu í Keypmannahavn. Sjálvt um tað ikki beinleiðis framgongur av uppskotinum, so mundi ætlanin helst vera, at henda umboðsstova skuldi koma í staðin fyri okkara umboð í fólkatinginum. Hetta mál vann ikki frama.

Fyri góðum ári síðani hevði løgtingið málið um okkara umboð í fólkatinginum til viðgerðar, eisini eftir uppskoti frá Sjálvstýrisflokkinum. Rættarnevndin kom við fleiri minniluta-álitum um broytta umboðan í fólkatinginum; men einki teirra fekk meirluta.

Nú møguleiki røkist fyri, at grundlógin verður endurskoðað, er stundin komin, at málið um fólkatingsumboðini verða tikin upp aftur til viðgerðar.

Tað eru fleiri møguleikar fyri broytingum í núverandi skipan.

1. Umboð føroyinga í fólkatinginum verða tikin av.
   Tað kann ikki vera beint, at vit føroyingar velja umboð í tvey lóggávuting.
2. Umboð okkara í fólkatinginum hava talirætt, men ikki atkvøðurætt.
   Tað er ofta komið fyri, at føroysku umboðið hava verið avgerandi fyri úrslitið av lóggávuarbeiði í fólkatinginum.
3. Umboð okkara verða vald av løgtinginum og ikki sum nú við fólkaatkvøðu. Annars við somu rættindum í fólkatinginum, sum nú er.
   Tá hevði borið til at valt eitt umboð frá samgonguni og eitt frá andstøðuni.
   Eisini slapst undan at reka veljaran á val meira enn gott er. Síðan vit fingu heimastýrislógina í 1948, hevur í meðal verið val til fólkatingið at kalla annað hvørt ár.
4. Umboð okkara verða vald av løgtinginum, men tey hava talurætt og ikki atkvøðurætt í fólkatinginum.

Aðrir møguleikar kundu eisini hugsast.

Men hetta uppskotið til samtyktar miðar fyrst og fremst ímóti at skipa so fyri, tá og um so verður, at meiriluti er fyri

at broyta núgaldandi skipan viðvíkjandi okkara fólkatingsumboðum, at fortreytirnar tá eru í lagi - nevniliga neyðug broyting í grundlógini

Á FØROYA LØGTINGI, 25. oktober 1989.

Törbjørn Poulsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 29/1989: Umboð føroyinga í fólkatinginum.

Málið er framlagt av Sjálvstýrisflokkinum tann 26. oktober 1989 og eftir 1. viðgerð 31. oktober beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í 4 minnilutar.

Minnilutin (Hergeir Nielsen, Bjarni Djurholm og Jákup Mikkelsen) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Pauli Ellefsen og Suni Jacobsen) tekur ikki undir við málinum, og setur tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Marita Petersen) hevur tað støðu, at stýrisskipanarspurningurin sum heild eigur at verða viðgjørdur á Føroya løgtingi, áðrenn heitt verður á donsku stjórnina at gera broytingar.

So leingi fólkatingið er løggávuting fyri Føroyar, eiga Føroyar eisini at verða umboðaðar her, og tí tekur minnilutin ikki undir við uppskotinum, og setur einki uppskot fram.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot sjálvstýrisfloksins.

Marknaðarnevndin 23. februar 1990.

Hergeir Nielsen | Pauli Ellefsen | Suni Jacobsen

Niels Pauli Danielsen | Bjarni Djurholm | Jákup Mikkelsen

Marita Petersen.

SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 30/1989: Mótmæli móti goymslu av kjarnorkubrennievni í Dounreay í Skotlandi.

U p p s k o t

til

samtyktar.

1. Føroya Løgting samtykkir at mótmæla samtyktini hjá bretsku stjórnini um goymslu av kjarnorkubrennievni í Dounreay.

2. Føroya Løgting setir serliga nevnd við umboðum av øllum flokkum at samskipa mótmælini og bardagan móti goymsluni.

3. Álagt verður landsstýrinum eina ferð um mánaðin at kunna føroyska almenningin um geislavirkni í sjónum og luftini.

4. Føroya Løgting samtykkir at áleggja landsstýrinum at koma við uppskoti um eina tilbúgvingar og bjargingarætlan í sambond við kjarnorkuvanlukkur í seinasta lagi 1. januar 1990.

Viðmerkingar:

Øll droyma vit um eina betri framtíð, men tað er ikki nóg mikið við dreymum. Tað er í dag vit viðgera tryggleika og framtíðarviðurskiftir okkara. Uttan reina luft, reint vatn og óspilta náttúru vilja bæði íðnaðar grundvøllur og lívsmøguleikar okkara vera í sori. Dysturin fyri umhvørvinum er tí tann týdningarmiklasti spurningurin júst nú. Vanlukkan aftan á Tjernobyl er ein óhugnalig áminning um, at umhvørvi okkara er viðkvæmt.

Móti kjarnorkudálking hjálpir einki, ongar forðingar, eingin Berlinmúrur ella landamørk.

Umhvørvisspurningarnir mugu nú fáa nógv hægri prioritet. Tað má vera góður politikkur at tryggja framtíðina.

Tey næstu 50 árini fara 75.000 fólk at doyggja orsakað av Tjernobylvanlukkuni í Ruslandi, og eitt stað millum 5.000 og 150.000 onnur av kreft runt um í heiminum orsakað av sama ósketni, vilja amerikanskir granskarar vera við.

Náttúru og umhvørvisvernd er ein týdningarmikil partur av politikki sjálvstýrisfloksins. Tí sendi flokkurin í sini tíð umboð bæði til Noregs og Onglands at mótmæla endurnýtsluverkinum við Dounreay. Tí fall tað í okkara lut sum teir fyrstu at gera bretsku stjórnini vart við hetta vandamál.

Dysturin varð í fyrsta umfari vunnin.

Men nú hevur bretska stjórnin boðað frá, at hon hevur samtykt, at Dounreay nú skal brúkast til goymslu fyri kjarnorkuburturkasti.

Eingin ivi er um, at bretska konservativa stjórnin heldur fast við avgerð sína, meðan teir liberalu og arbeiðaraflokkurin fyrr hevur lovað, at alt virksemi við Dounreay skal halda uppat, tá teir fáa stjórnarvaldið.

Frá føroyskari síðu eigur bretska stjórnin áhaldandi at fáa mótmæli frá Føroya løgtingi. Um hetta ikki hjálpir, eiga hesi viðurskifti at samskipast á ein heilt annan hátt. Tí eigur Føroya løgting at seta serliga nevnd við fastari skrivstovuhjálp við umboðum fyri allar flokkar at viðgera og koma við uppskotum um tiltøk og loysnir í bardaganum móti ætlaðu kjarnorkugoymsluni við Dounreay.

Kjarnorkugoymslan kemur at liggja bert 350 km frá Føroyum.

Alt okkara lívsgrundarlag er hótt við nýggju Dounreay-samtyktini, og hesum viðurskiftum kunnu vit ikki bert standa tigandi og hyggja at, sum um einki var hent.

Ein leki á eina slíka kjarnorkugoymslu nóttir og týnir alt lív í Norðuratlantshavinum.

Flestu føroyingar hava hildið, at Føroya landsstýri hevur tikið hesar spurningar í álvara, men tað er ikki nóg mikið við føgrum og gyltum orðum at luttaka á internationalum fundum

um umhvørvisdálking o.s.fr. Viðgerðin frá føroyskari síðu tykist at vera alt ov tilvildarlig.

Orð mugu gerast til gerðir ongantíð ov skjótt. Verður goymslan veruleiki, kunnu vit lættliga koma út fyri álvarsamari dálking av egnum umhvørvi, sum kemur at týna alt lív á hesum kletтum, og tí verður sett fram hetta uppskot til samtyktar.

Á FØROYA LØGTINGI, 26. oktober 1989.

Lasse Klein

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 30/1989: Mótmæli móti goymslu av kjarnorkubrennievni í Dounreay í Skotlandi.

Málið er framlagt av Sjálvstýrisflokkinum tann 26. oktober 1989 og eftir 1. viðgerð 31. oktober beint í umhvørvisnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við landsstýrismannin í umhvørvismálum, Jóngerð Purkhús. Eisini hevur formaðurin í umhvørvisnevndini havt samrøðu við umboð fyri fróðskaparsetrið, Petur Zachariassen, og við brunaráðið, v/ Johan Ziskason, formann. Eisini hevur samrøða verið við Nepper Christensen, landfúta, um málið.

Við á nevndarrundi hava verið serfrøðingarnir Petur Zachariassen, Trygvi Vestergaard, Bogi Hansen og Jákup Pauli Joensen.

Spurningurin um útvegan av eini frambornari tilbúgvingar- og bjargingarætlan er ikki lættur at loysa, men upplýst er frá omanfyrinevndu persónum, at arbeitt verður við málinum, tó skal tilskilast, at ávaringartól eru tøk, men ikki enn í nýtslu.

Víðari er upplýst, at einki størri geislavirksemi er mált tey seinru árini.

Í løtuni er eingin samskipað bjargingarætlan, men arbeitt verður við hesum.

Tá Føroyar eru eitt oyggjaland, má hetta takast við í umhugsingunum hesum viðvíkjandi, serliga tá óhapp eru hend í orkuriknum kavbátum nær okkara leiðum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eliesar Arge, Finnbogi Ísakson, Edmund Joensen) vísir á uppskot til samtyktar dagfest 1. februar 1988 frá umhvørvisnevndini í løgtingsmáli nr. 60/1987: Føroyskt mótmæli móti bygging av verki til endurvinnan av kjarnorkubrenni-

evni í Dounreay í Skotlandi og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Lasse Klein og Marita Petersen) førir fram, at dagin eftir, at uppskotið var lagt fram á ting, samtykti landsstýrið at mótmæla móti goymslu av kjarnorkubrennievni í Dounreay hjá bretsku stjórnini, og tí fellur punkt 1 í uppskotinum til samtyktar burtur. Í staðin mælir minnilutin til hetta

U p p s k o t

til

samtyktar

Nýtt punkt 1:

Álagt verður landsstýrinum at samskipa mótmælini og taka upp beinleiðis samráðingar við donsku, norsku, svensku og íslendsku stjórnirnar, umframt grønlendska landsstýrið um í felag at mótmæla goymslu av kjarnorkubrennievni í Dounreay.

Punkt 3 fellur burtur. Síðani uppskotið varð sett fram, verða javnan kanningar gjørdar í sambandi við geislavirkni, men neyðugt er í størri mun at samskipa hesar kanningar. Upplýst varð á fundi at arbeitt verður við hesum spurninginum.

Punkt 4 verður broytt til punkt 3. Mælt verður til hesa broyting:

Í staðin fyri "1. januar 1990" verður sett: "1. januar 1991".

Minnilutin førir eisini fram, at tá meirilutin vísir á uppskot til samtyktar dagfest 1. februar 1988 í løgtingsmáli nr. 60/1987: Føroyskt mótmæli móti bygging av verki til endurvinnan av kjarnorkubrennievni í Dounreay í Skotlandi, og tí einki uppskot setir fram, má metast, at meirilutin neyvan tekur málið í fullum álvara. Fyri tað fyrsta er talan um eitt heilt annað mál, fyri tað næsta eru stórar broytingar farnar fram á hesum øki síðani tá.

Á fundi við ávísar serfrøðingar kom fram, at eingin ávísur myndugleiki hevði fingið til uppgávu at samskipa ella

hava ábyrgd fyri, at arbeiðini verða gjørd, og tí er neyðugt, at ein ávís dagfesting verður sett, til arbeiðini skulu verða liðug.

Tað er skelkandi at fáa at vita, hvussu stutt ávegis vit eru komin í hesum spurningum, og tí er av álvara neyðugt at skunda undir, at arbeiðini í sambandi við tilbúgving og bjarging í sambandi við kjarnorkuvanlukkur verða gjørdar beinanvegin.

UMHVØRVISNEVNDIN, 27. apríl 1990.

Eliesar Arge Finnbogi Ísakson Edmund Joensen

Marita Petersen Lasse Klein

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 27. oktober 1989

F. L. j. nr. (at tilskila í svari) 1415-2-8

Tlf. [illegible]. Telex 81310 tinghs fa. Telefax 14942. Postbox 64
Avgreiðslutíð kl. 10—15, leygardar stongt
JøH/or

Løgtingsmál nr. 11/1989: Broyting í løgtingslóg um endurnýggjing av fiskiskipaflotanum.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurnýggjing av fiskiskipaflotanum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 102 frá 19. august 1988 um endurnýggjing av fiskiskipaflotanum verður í § 16, stk. 1 sett aftaná deksfiskifari: "ella til avdráttir av láni, ið Færøernes Realkreditinstitut fyrstu ferð veitir føroyskum deksfiskifari, sum ikki er eldri enn 10 ár."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Sum lógin er nú loyvir hon bert landsstýrinum at læna til avdráttir fyrstu 2 árini til Færøernes Realkreditinstitut tá talan er um nýbygningar.

Við broytingini er hugsað um t.d. nýggj føroysk deksfiskifør, ið hava tunga útlendska fígging, har umfígging "fyrstu ferð" kann lætta um raksturin.

Ætlanin er tó ikki at Færøernes Realkreditinstitut skal fíggja nakað skip meira enn eina ferð og treytin er, at skipið er undir 10 ár.

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður

/ Kjartan Hoydal

Løgtingslov om ændring i lagtingslov om fornyelse af fiskeflåden.

§ 1.

I lagtingslov nr. 102 af 19. august 1988 om fornyelse af fiskeflåden bliver i § 16, stk. 1 tilføjet efter dæksfiskefartøj: "eller til afdrag af lån, som Færøernes Realkreditinstitut første gang yder færøsk daksfiskefartøj, som ikke er ældre end 10 år."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Á l i t

løgtingsmáli nr. 31/1989: Endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 28. december 1989 og eftir 1. viðgerð 24. januar 1990 beint á fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

FISKIVINNUNEVNDIN, 22. februar 1990.

Svend Aage Ellefsen Suni Jacobsen Petur Reinert

Jákup Lamhauge Jógvan Durhuus Henrik Old

Tórbjørn Poulsen

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMURDS- OG FISKIVINNUFLOKKUR.

Førova Løgting

Løgtingsmál nr. 32/1989: Tiltøk í samband við rúsevni

U P P S K O T

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum sum skjótast at seta munabetri tiltøk í verk til tess at minka um innflutningin og nýtsluna av narkotiskum evnum.

Viðmerkingar:

Í fjølmiðlum hevur nógv verið at hoyrt um herðferðina móti sokallaðum "narkotika barónum" í Columbia og øðrum londum.

Myndileikarnir í avvarðandi londum hava ásannað skaðiligu og dapru avleiðingarnar av narkotikanýtsluni, og hava tí av álvara hert stríði ímóti teim íð standa aftanfyri hesa framleiðslu og vinna pening uppá vanlagnuna hjá øðrum.

Hvat nýtsluni av narkotiskum evnum í Føroyum viðvíkur, er hendan helst munandi størri enn higartil hildið.

Á fundi við løgregluna í Tinganesi 12.apríl var m.a. upplýst, at talið av hashmisnýtarum helst var fleiri hundrað, og at henda nýtsla var vaksandi.

Eisini er talan um nýtslu av"harðari"evnum.

Hesi evni talan er um (hash, marihuana v.fl) koma sum kunnugt uttaneftir, og vísa royndir úr øðrum londum, at roknast kann við, at hald verður lagt á í mesta lagi 10% av teim evnum, ið innflutt verða.

Tí er tað eisini umráðandi at avmarkað innflutningin í størst møguligan mun.

Higartil hevur tollvaldið gjørt brúk av einum sokallaðum "hash-hundi" til endamálið, men er tað sjálvandi avmarkað hvat

ið avrikast kann bert við einum hundi. Tí má tað metast neyðugt, at fleiri hundar fást til vega, og at løgreglan eisini fær til taks slíkar hundar til hennara arbeiði á hesum øki.

Ein afturvendandi spurningur er hvørt nóg mikið starvsfólk er til taks til hesa týðandi uppgávu, og má tað tí her sláast fast, at møguligar sparingar innan løgregluna hjá donsku mynduleikunum, ikki eiga at darva at neyðug tiltøk verða sett í verk her á landi.
At spara á hesum øki, má av sonnum metast sum løtuvinningur, og kann kosta okkum dýrt í seinna enda!

Eitt annað týðandi tiltak at fyribyrgja nýtsluni av narkotiskum evni er upplýsing , og verður her hugsað um miðvísa upplýsing heimanífrá, innan skúlans gátt eins væl íggjognum fjølmiðlarnar.
Tí varð tað m.a. eisini at landsstýrið á fundi 7.apríl 1989 samtykti, at seta á stovn "Rúsdrekka-og narkotikaráð", hvørs uppgáva skuldi verða m.a. at stuðla, íbirta og seta í verk fyribyrgjandi virksemi, og at verða ráðgevandi hjá landsins mynduleikum o.ø.
Men hvat skilst er ongan veg komið við hesum ráðið og virksemi tess.

Gamalt króatak sigur: "Betri er at binda um heilan fingur", og eiga vit tí at leggja áherðslu á, at seta neyðug tiltøk í verk til tess í størst møguligan mun at avmarka innflutningi og nýtsluni av hesum skaðiligu evnum, sum hevur lagt lívið hjá mongum í oyði.

Ein íløga á hesum øki má av sonnum metast skilagóð og nyttulig fyri ungdóm okkara, komandi ættarlið og verandi Føroysku tjóðina at gagni.

Á FØROYA LØGTINGI 31.1o.1989

Tórður J. Niclasen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 32/1989: Tiltøk í samband við rúsevni.

Málið er framlagt av Kristiligа fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 31. oktober 1989 og eftir 1. viðgerð 10. november 1989 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri politivaldið, tolleftirlitið, tollstovuna og Árna Olsen, yvirlækna á psykiatriskari deild á landssjúkrahúsinum.

Nevndin er samd um at heita á landsstýrið um at seta í verk skerpaðar reglur um, hvussu best verður forðað fyri, at narkotisk evni koma til Føroyar.

Nevndin heitir á landsstýrið um beinavegin at seta í verk tey tiltøk ímóti narkotiskum evnum, ið longu eru samtykt, eitt nú stovnsetan av "Rúsdrekka- og narkotíkaráð", keyp av hashhundi og annars tiltøk ið fíggjarligt grundarlag er fyri innanfyri karmarnar á galdandi fíggjarlóg.

Nevndin heitir á landsstýrið um at seta neyðugan pening av á fíggjarlógini 1991 til hert eftirlit við innflutningi og nýtslu av narkotiskum evnum.

Ein samd almanna- og heilsunevnd tekur undir við malinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot Kristiligа fólkafloksins, Føroya framburðs- og fiskivinnufloks.

ALMANNA- OG HEILSUNEVNDIN, 18. mai 1990.

Petur Reinert Flemming Mikkelsen Jógvan á Lakjuni

Jákup Lindenskov Niels Pauli Danielsen

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURÐS-OG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 33/1989: Broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um húsalánsgrunn.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om boligfond.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr 97 frá 1.november 1978 við seinri broytingum um húsalánsgrunn verða gjørdar hesar broytingar:	I lagtingslov nr. 97 fra 1. november 1978 med senere ændring om boligfond foretages følgende ændringer:
1. Í § 12 verður ístaðin fyri "20 ár" sett "35 ár"	1. I § 12 ændres "20 år" til "35 år".
2. Í § 12 verður sett sum nýtt 2. stk: "Lán tikin eftir 1.jan. 1989 eru tey fyrstu 4 árini rentu-og avdráttarfrí."	2. I § 12 affattes nyt stk. 2 således: "Lån optaget efter 1.jan. 1989 er de første 4 år rente-og afdragsfri."
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Hvørja fer mál viðvíkjandi Húsalánsgrunninum hava verið til viðgerðar, hevur ljóðað frá øllum flokkum, at Húsalánsgrunnurin ikki í nóg stórt mát hjálpti fólki við fígging av sethúsabygging v.m., og at endamálið við grunninum sostatt ikki var nátt.

Hóast broytingar síðan lógin í 1978 varð endurskoðað, so má ásannast, frá politiskari síðu hevur ikki verið víst stórsta vælvild fyri at økja um møguleikarnar hjá teim,ið festa búgv, í nóg stóran mun at merkja lætta við lántøku júst úr hesum almenna grunni.

Í hesum døgum, har nógv hava druput at fáa endarnar at røkka, man eingin ivi vera um, at tey sum sita eina ringast í tí, er tey, sum sett hava fót undir egið boró, og striðast við rentur og avdráttir av stórum lánum.

Hjá flest øllum av hesum mundi tað kennast sum steinur varð lagdur á byrðu, tá lógin um bundna uppsparing fyri stuttum, við afturvirkandi kraft, varð sett í verk.

Verður eingi gjørt fyri at lætta um fíggjarbyrðuna hjá hesum, verður tað soleiðis, at fleiri fara á húsagang og noydast at rýma frá hús og heimi.

Hetta í sær sjálvum at familjur við børnum missa tak yvir høvdið er ein sorgarleikur, umframt at negativir sosialir avleiðingar fara at síggjast í samfelagnum, tá hópur av familjum koma í slíka støðu.

Uppskot okkara hevur til endamáls í stóran mun, at fyribyrgja at so verður, nevnliga at lætta um byrðuna, soleiðis, at afturgjaldingartíðin fyri øll lán verður longd úr 28 árum til 35 ár og, at nýggj lán fáa ein rentu-og avdráttarskáa í 4 ár.

Í samband við rentu-og avdráttarskáan verður skotið upp, at lán tikin seinni enn 1.januar 1989 koma undir skipanina.

Her var tað kanska rættast at havt ávísar skiftisreglur.

Taka vit t.d. at góð milliún er í láni, harav 230.ooo kr, í Húsalánsgrunninum, so merkir tað, at lántakarin kemur at gjalda uml. kr 2o.ooo minni árliga.

Sjálvandi kemur ein slík skipan at stilla storri krøv til fíggjarorku húsalánsgrunnsins.

Um hesin peningur skal fáast til vega yvir løgtingsfíggjarlógina, so verður tørvurin kr. 4o mió. í einum 4 ára tíðarskeiði. Her er so frároknað tað, ið landið sparir í skattafrádrátti(42%).

Ein annar møguleiki fyri fígging var at lagalig lán í nógv størri mun enn higartil vóru veitt Húsalánsgrunninum, soleiðis sum vit áður mangan hava víst á.

Ein triði møguleiki fyri at styrkja fíggjarorku grunnsins, var

at lógin um rentustuðning til samansparing til húsabygging frá 1978 við seinri broytingum, varð broytt soleiðis, at Húsalánsgrunnurin fekk møguleika fyri, at umsita ikki bert sjálva skipanina , sum nú, men samlaða innskotspeningin - ella part av hesum - saman við rentustuðningirum stavandi frá umtalaðu samansparing. Hetta vildi verið ein háttur at bøtt munandi um likviditet grunnsins og harvið møguleikar hansara í størri mun at lætta um fíggjarbyrðarnar stavandi frá lánum í samband við at fólk fáa sær tak yvir høvdið.

Ikki minst er hetta neyðugt og kærkomið í hesum døgum, har trýstið av skattabyrðuni fær mangan at hokna og ringt - fyri ikki at siga ógjørligt - at síggja hvussu endarnir skulu røkka.

Vísandi til omanryristandandi verður sett fram soljóðandi

U P P S K O T

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot til broytingar av løgtingslóg um "Rentustuðning til samansparing til húsabygging", og sum skjótast leggja hetta fyri tingið.

Á FØROYA LØGTINGI, 24. novembur 1989

Tordur J. Niclasen

+ skjal.

SKJAL

Ár.:	1.	2.	3.	4.
Lán, í tali	580	580	580	580
Meðallán í 1.000 kr	160	180	200	220
Útlán alls	92.800	104.400	116.000	127.600

Um lánini verða avdráttarfrí:

Fíggjartilgongdin lakkar	464	1.450	2.552	2.726
Akkumuleraó	464	1.914	4.466	7.192

Um lánini verða rentu og avdráttarfrí:

Fíggjartilgongdin lakkar	4.176	13.050	22.968	24.534
Akkumuleraó	4.176	17.226	40.194	64.728
Landió sparir í skatta-frádrátti, (42%)	1.559	4.872	8.575	9.159
Nettokostnaður	2.617	8.178	14.393	15.375
Akkumuleraður	2.617	10.795	25.188	40.563

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 33/1989: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn.

Málið er framlagt av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 24. november 1989 og eftir 1. viðgerð 29. november beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Anfinn Kallsberg, Eilif Samuelsen, Flemming Mikkelsen, Jógvan Durhuus og Heini O. Heinesen) er av teirri áskoðan, at tá landsstýrið arbeiðir við málinum, er tað skeivt at broyta galdandi lóg, men vil steðga, til møguligar broytingar koma frá landsstýrinum, og setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Tordur Niclasen og Jørgen Thomsen) ger enn eina ferð vart við, at í hesum døgum, har nógv hava trupult við at fáa endarnar at røkka, man eingin ivi vera um, at tey, sum sita eina ringast í tí, eru tey, sum sett hava fót undir egið borð, og stríðast við rentur og avdráttir av stórum lánum.

Hjá flest øllum mundi tað eisini kennast, sum steinur varð lagdur á byrðu, tá lógin um bundna uppsparing við aftur-virkandi kraft, varð sett í verk.

Verður einki gjørt til tess at lætta um figgjarbyrðuna hjá hesum, fer tíðin at vísa, at fleiri fara á húsagang og noyðast at rýma frá húsi og heimi.

Tað í sær sjálvum, at familjur við børnum missa tak yvir høvdi, er ein sorgarleikur, umframt at negativar sosialar avleiðingar fara at síggjast í samfelagnum, tá hópur av familjum koma í slika støðu.

Umframt at ásarna tað neyðuga í, at uppskotið verður samtykt, er tað umráðandi, at Húsalánsgrunnurin fær størri

fíggjarorku at ráða yvir, og verður ti sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at økja munandi um fíggjarorku húsalánsgrunsins soleiðis, at hesin í nógv størri mun kann veita neyðug lán og yvirtaka falnar avdráttir/rentur hjá teim, ið annars standa at missa húsini.

FÍGGJARNEVNDIN, 29. mars 1990.

Anfinn Kallsberg Flemming Mikkelsen Jógvan Durhuus

Eilif Samuelsen Heine O. Heinesen Tordur Niclasen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

TF. 11088 . Telex 81310 (fargra fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Augnaboksurin: Kl. 10—15, leygardag stongt

29. mars 1990

F. L. j. nr.
Fat tilskila i svarir

1820-9-1

EJ/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 34/1989: Broyting í lóg um flogferðslu.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir viðlagda uppskot til kongiliga fyriskipan um at seta lóg nr. 117 frá 11. mars 1987 um broyting av lóg um flogferðslu í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:

Galdandi lóg í Føroyum um flogferðslu er lóg nr. 252 frá 10. juni 1960 um flogferðslu við seinni broytingum. Lógin fekk gildi í Føroyum 1. mai 1989.

Talan er um at seta í gildi eina broyting til hesa lóg. Broytingarlógin fær fyribils einans gildi fyri innlendis flogferðslu, har millumlending uttan fyri ríkið ikki er avtalað, og fyri aðra flogferðslu, sum ikki er fevnd av nakrari útgávu av Warzawa-konventiónini. Flogferðslan innanoyggja og millum Vágar og Keypmannahavn verður sostatt fevnd av hesi lóg.

Sambært galdandi lóg ábyrgist flutningsfyritøkan fyri fólk og fæ umborð á flogfarinum; fyri fólk eisini tá tey eru á veg umborð ella úr flogfarinum, og fyri ferðafæ eisini meðan tað er í varðveitslu hjá flutningsfyritøkuni.

Henda ábyrgd kann tó fella burtur, um so er, at flutnings-
fyritøkan kann prógva, at hon ella starvsfólk hjá henni hava gjørt alt tað, sum neyðugt er fyri at sleppa undan skaðanum, ella at tað ikki hevur verið møguligt hjá henni at sloppið undan skaðanum. Talan hevur sostatt verið um eina sokallaða endurgjaldsábyrgd við viðvendari prógvbyrðu.

Henda lógarbroytingin hevur við sær, at ábyrgdin fyri fólki og fæi verður strangari hjá flutningsfyritøkuni, ein sokallað objektiv ábyrgd, sum verður galdandi fyri allar skaðar uttan teir, sum stava frá seinkingum. Fyri seinkingar fara verandi reglur at halda fram at hava gildi.

Onnur broytingin, sum lógin hevur við sær er, at galdandi krøv til, hvat skal standa í ferðaseðlaskjølum og øðrum flutningsskjølum, verða linkað, so lættari verður at avgreiða hesi á teldukervi.

Samanumtikið verður mælt til at taka undir við hesi broyting, tá hon kemur at styrkja um rættarstøðuna hjá ferðafólkunum.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/ Eyðfinnur Jacobsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 34/1989: Broyting í lóg um flogferðslu.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 3. apríl 1990 og eftir í. viðgerð 26. apríl beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er vorðin kunnað um, at talan er um dagføring av altjóða reglum, uttan at hetta inniber avleiðingar á kostnaðarsíðuni fyri brúkaran.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

RÆTTARNEVNDIN, 22. mai. 1990.

Jógvan Durhuus Marita Petersen John Petersen

Tordur Niclasen Eilif Samuelsen

SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 35/1989: Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjald v.m.

U P P S K O T

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjald v.m. við seinni broytingum.

§ 1

Í løgtingslog nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjøld v.m. verður gjørd hesa broyting:

Í § 1, pkt. 1 verður sett nytt lbnr. 1.02: "Bensin, ið ikki inniheldur blýggj, á ltr.. .3,25 kr.

§ 2

Hesa lóg kemur í gildi dagin eftir , at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgifter m.m. med senere ændringer.

§ 1

I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.m. med senere ændringer foretages følgende ændring:

I § 1, pkt. 1 tilføjes nyt lbnr. 1.02:"Blytrit benzin i ltr...3,25 kr."

§ 2

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar.

Í flest øllum londum í Vesturevropa verður hildið monnum til at nýta bensin, ið ikki inniheldur blýggj.

Hetta er sjálvandi orsakað av teirri dálking, sum stendst av vanliga bensininum.

Til tess at eggja bilverksmiðjunum til at framleiða bílar, sum eisini kunnu brenna blýfritt bensin, og at fáa brukaran at nýta hetta brennievni í staðin fyri vanligt bensin, er neyðugt at hava ein prismun imillum hesi bæði brennievni.

Hóskandi talva, sum lýsir støðuna, sum hon var í Europu í summar. Tølini broytast í heilum, men munu tey, sum her eru víst, og sum eru meðaltøl, ikki vera heilt av leið:

	prismunurin imillum vanligt bensin og bensin, sum ikki inniheldur blýggj		søian av bensini, sum ikki inniheldur blýggj, í mun samlaðu søluna av bensini
Vesturtýskaland	35 oyru		50 %
Schweis	35 "		50 "
Eysturriki	22 "		38 "
Svøriki	23 "		35 "
Nederland	24 "		31,5 "
Danmark	30 "		30-35 "
Noreg	41 "		26 "
Bretland	26 "		20 "
Frakland	12 "		10 "
Belgia	22 "		9,3 "
Finnland	35 "	*	2 "
Italia	-12 "	**	minni enn 1 "
Spania	-18 "	**	" 1 "

* prismunurin er nýliga ikomin
** blýfritt bensin dýrari enn vanligt bensin

Sum tað framgongur av talvuni, og sum ein kundi vænta, er nýtslan an blýfria bensininum tengt at prismuninum millum brennievnini. Tá ein ávís tið er fralíðin, er nýtslan av bensini, sum ikki inniheldur blýggj størst, har prismunurin er størstur.

Flest allir bilar í dag verða gjørdir til eisini at kunna brenna blýfritt bensin. Í Danmark verður mett, at av teim 1,6 milj. bensindrivnu bilunum har í landinum, kann helmingurin uttan trupulleikar brenna blýfritt bensin, og tann parturin sum nýtir hetta brennievni er skjótt vaksandi. Sambært Statoil, var nýtslan av blýfrium bensini í Danmark fyrstu viku av 1989 20 % og í viku 42 38 % av samlaðu bensinsøluni. Hetta er ein vøkstur uppá 18 % í nevnda tíðarskeiði.

Til hvønn litur av vanligum bensini er tilsett 0,15 gr. av blýggj, ella rættari blýggjtetraethyl. $Pb(C_2H_5)_4$. Samlaða nýtslan av bensini í Føroyum í 1988 var 20 milj. lítrar. T.v.s., at vit árliga sleppa einum 3 tonsum av blýggi út í rumdina.

Blýggj og blýggjsambindingar eru sera eitrandi, og eiga vit at gera okkara til at dálka umhvørvið sum minst við hesum vandamikla evni.

Blýggjfritt bensin er heldur dýrari at framleiða enn vanligt bensin, eini 20 oyru/ltr. Tí verður neyðugt at leggja nakað upp fyri, tá avgjaldið verður ásett, skulu vit fáa sama prismun í søluliðnum, sum vist er í tolvuni omanfyri.

Samtykt fyriliggjandi lógaruppskot verður mælt til at seta avgjaldið fyri bensin, sum ikki inniheldur blýggj, til kr. 3,25 - tað er 50 oyru lægri enn fyri vanligt bensin. Meta vit, eins og í Danmark, at helmingurin av bensindrivnu bilunum hjá okkum kann nýta blýfritt bensin, kemur landskassin tískil í fyrsta umfari í mesta lagi at missa eina inntøku stóra kr. 5 milj. árliga - og tað er mátið vert.

Á FØROYA LØGTINGI, 10. november 1989

Törbjørn Poulsen

Á l í t

í

løgtingsmáli nr. 35/1989: Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

Málið er framlagt av Sjálvstýrisflokkinum tann 10. november 1989 og eftir 1. viðgerð 21. november beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini tann 4. december 1989 havt fund við umboð fyri gjaldstovuna og fyri bileftirlítið.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og ein minnilluta.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Eilif Samuelsen og Heini O. Heinesen) vísir á, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum Ivan Johannesen undir 1. viðgerð upplýsti, at landsstýrið arbeiðir við málinum, og mælir tí meirilutin løgtinginum til at samtykkja, at málið verður sent landsstýrinum.

Minnilutin (Torbjørn Poulsen og Atli P. Dam) mælir til at samtykkja uppskot sjálvstýrisfloksins.

SKATTANEVNDIN, 5. december 1989.

Jógvan við Keldu Eilif Samuelsen Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TF. 11080 . Telex 81310 (inqmx is . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, kevgarmag stongt

10. november 1989

F. L. j. nr. 340-1
(at tilskila í svarinu)

EJ/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 36/1989: Løgtingslóg um Ferðaráð Føroya.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um Ferðaráð Føroya.

§ 1. Ferðaráð Føroya er stovnur undir Føroya Landsstýri.

Stk. 2. Ferðaráð Føroya hevur til endamáls at menna og skipa ferðavinnu í Føroyum, so hon gerst ein meira týðandi táttur í samfelagsbúskapinum og fjøltáttar vinnu og samfelagslív til frama fyri livilíkindini og trivnaðin hjá teimum, sum her búgva.

§ 2. Uppgávurnar hjá Ferðaráðnum eru m.a. hesar:

1) at gera skipanir og ætlanir viðvíkjandi føroysku ferðavinnuni,
2) at upplýsa um Føroyar

lagtingslov om Færøernes Turistråd.

§ 1. Færøernes Turistråd er en institution under Færøernes Landsstyre.

Stk. 2. Færøernes Turistråd har som formål at udvikle og styre turisme på Færøerne, så den kommer til at udgøre en mere betydningsfuld faktor i samfundsøkonomien og mangfoldiggør erhverv og samfundsliv til fordel for den færøske befolknings livsvilkår og trivsel.

§ 2. Turistrådets opgaver er bl.a. følgende:

1) at udarbejde forskrifter og planer vedrørende det færøske turisterhverv,
2) at oplyse om Færøerne

bæði innan- og uttanlands.

3) at hjálpa og vegleiða ferðafólki, ið koma til landið,

4) veita hjálp til áhugafelagsskapir kring landið, herundir stovnseting av avgreiðslum, har tað tykist neyðugt,

5) at fyriskipa upplæring av starvsfólki í ferðatænastuvirksemi,

6) at hava neyvt samstarv við jarðaeigarar og friðingarmyndugleikar við tí endamáli, at náttúru- og mentunarvirði ikki verða skemd ella fara fyri skeyti av tí virksemi, ferðastreymurin hevur,

7) at virka fyri, at lagdar verða til rættis útferðir, vitjanir o.a. ítriv fyri ferðafólk,

8) at skráseta gistingarpláss og samskipa sølu av teimum við avgreiðslur á staðnum og ferðastovur,

9) at virka fyri, at tað til eina og hvørja tíð er nóg mikið av rúmligum gistingar- og matstovuhentleikum, bæði í dygd og nøgd,

10) at geva tilmæli til avvarðandi myndugleikar/stovnar/virkir um

både inden- og udenlands,

3) at yde turister, der ankommer her til landet, hjælp og vejledning,

4) yde assistance til interessegrupper rundt i landet, herunder etablering af ekspeditioner, hvor det skønnes nødvendigt,

5) at forestå oplæring af personale indenfor turisterhvervet,

6) at have nært samarbejde med jordejere og fredningsmyndigheder med det formål at undgå at turiststrømmen kommer til at skæmme eller ødelægge natur- eller kulturværdier,

7) at arbejde for, at der planlægges udflugter, besøg og anden fritidsbeskæftigelse for turister,

8) at registrere overnatningspladser og samordne salget af disse med lokale ekspeditioner og rejsebureauer,

9) at arbejde for, at der til enhver tid er tilstrækkeligt med rummelige overnatnings- og spisefaciliteter, både hvad kvalitet og antal angår,

10) at afgive indstillinger

flutningsspurningar, umhvørvisspurningar, mentunartiltøk, fíggjartiltøk og á øðrum økjum, ið hava við fremmandavitjanir at gera,

11) at gera vegleiðingar og geva upplýsingar um, hvar og hvussu fólk kunnu ferðast ella stoðast,

12) at fylgja við teldu- og hentleikamenningini yvirhøvur innan ferðavinnuna og veita neyðugа ráðgeving,

13) at virka fyri at tey, sum reka ferðastovur, seta á stovn ein trygdargrunn ferðavinnunnar.

§ 3. Fyri ferðaráðnum situr stýri við 3 limum, ið verða valdir av Føroya Landsstýri, tá nýtt landsstýri tekur við. Formaðurin verður tilnevndur av Føroya Landsstýri.

Stk. 2. Stýrið er hægsti myndugleiki fyri ferðaráðnum og hevur ábyrgdina av virkseminum hjá ráðnum.

§ 4. Stovnað verður eitt ráðgevandi umboðsráð, ið umboðar

til vedkommende myndigheder/institutioner/virksomheder om transportspørgsmål, kulturarrangementer, financieringsordninger og på andre områder, der vedrører turisme,

11) at udfærdige vejledninger og meddele oplysninger om, hvor og hvorledes folk kan færdes og opholde sig,

12) at holde sig orienteret om EDB-udviklingen og udviklingen af andre faciliteter indenfor turisterhvervet og yde nødvendig vejledning,

13) at arbejde for, at indehavere af rejsebureauer etablerer en garantifond for turismen.

§ 3. Turistrådet ledes af en bestyreise på 3 medlemmer, der vælges af Færøernes Landsstyre, når nyt landsstyre tiltræder. Formanden udnævnes af Færøernes Landsstyre.

Stk. 2. Bestyrelsen er højeste myndighed for turistrådet og har ansvaret for turistrådets virksomhed.

§ 4. Der nedsættes et rådgiverde repræsentantskab, der

áhugamálini hjá ferðavinnuni.

Stk. 2. Landsstýrið avger hvørji følog, fyritøkur og stovnar hava rætt til at skjóta upp limir til umboðsráðið.

Stk. 3. Umboðsráðið skipar seg sjálvt.

Stk. 4. Stýrið eilla umboðsráðsformaðurin innkallar umboðsráðið til fundar í minsta lagi 2 ferðir um árið og annars so ofta, sum hetta verður mett neyðugt.

§ 5. Landsstýrið setir eftir ummæli frá stýrinum stjóra, ið tekur sær av dagliga rakstrinum.

Stk. 2. Stjórin tekur lut í øllum stýris- og umboðsráðsfundum uttan slíkum, sum hava við hansara persónligu viðurskifti at gera.

Stk. 3. Stýrið ger reglugerð fyri stjóran.

§ 6. Útreiðslurnar av ferðaráðnum verða goldnar úr landskassanum.

Stk. 2. Løn til stjóra og starvsfólk og samsýningar til nevndarlimir skulu góðkennast

repræsenterer turisterhvervets interesser.

Stk. 2. Landsstyret afgør hvilke foreninger, virksomheder og institutioner har ret til at indstille medlemmer til repræsentantskabet.

Stk. 3. Repræsentantskabet konstituerer sig selv.

Stk. 4. Bestyrelsen eller formanden for repræsentantskabet indkalder repræsentantskabet til møde mindst 2 gange om året og iøvrigt så ofte, som dette anses for nødvendigt.

§ 5. Landsstyret ansætter efter indstilling fra bestyrelsen en direktør, der varetager den daglige drift.

Stk. 2. Direktøren deltager i alle bestyrelses- og repræsentantskabsmøder, med undtagelse af sådanne, der vedrører hans personlige forhold.

Stk. 3. Bestyrelsen fastsætter reglement for direktøren.

§ 6. Turistrådets udgifter afholdes af landskassen.

Stk. 2. Lønninger til direktør samt personale og vederlag til bestyrelsesmedlemmer skal godkendes af lands-

av landsstýrinum.

§ 7. Tær gjøllaru reglurnar fyri ferðaráðið, sum tørvur skuldi verið á, setir landsstýrið.

§ 8. Stýrið skal á hvørjum ári innan 1. apríl senda landsstýrinum eina frágreiðing um

a) ferðavinnuna og virksemið hjá ferðaráðnum í farna ári og
b) hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk til frama fyri ferðavinnuna.

§ 9. Góðkenning til at reka ferðastovu, kann verða latin av ferðaráðnum eftir umsókn.
Stk. 2. Ein ferðastova er ein fyritøka, sum vinnuliga átekur sær at veita hesar tænastur:

1. Upplýsingar um ferðir innanlands ella uttanlands.
2. Umboðssølu av ferðaseðlum til skip, akfør, flogfør, jarnbreyt ella annan ferðaflutning.
3. Ávísa innivist.
4. Skipan og sølu av hópferðum innanlands ella uttanlands og móttoku av útlendskum ferðafólki.

Stk. 3. Stýrið tekur avgerð í

styret.

§ 7. De nærmere bestemmelser for turistrådet, der måtte vise sig at være nødvendige, fastsættes af landsstyret.

§ 8. Bestyrelsen skal hvert år inden 1. april sende landsstyret en beretning om

a) turisterhvervet og turistrådets virksomhed i det forløbne år og
b) hvilke foranstaltninger, der bør iværksættes til fordel for turisterhvervet.

§ 9. Autorisation til at drive rejsebureauvirksomhed kan meddeles af Færøernes Turistråd efter ansøgning.
Stk. 2. Et rejsebureau er en virksomhed, som erhvervsmæssigt yder følgende tjenester:

1. Oplysninger om rejser indenlands eller udenlands.
2. Agentsalg af billetter til skib, køretøjer, fly, jernbane eller anden rejsetransport.
3. Anvise indlogering.
4. Arrangement og salg af charterrejser indenlands eller udenlands og modtagelse af udenlandske turister.

ivamálum, um ein fyritøka lýkur treytirnar í stk. 2.

Stk. 4. Løgtingslóg nr. 33 frá 20. desember 1955 um vinnu v.m. við seinni broytingum verður eisini galdandi fyri tey, sum reka ferðastovur.

§ 10. Góðkenning kann latast fyri eitt avmarkað tíðarskeið og kann vera treytað av tøkum korum, sum verða mett neyðug.

§ 11. Um ásettar treytir ikki verða loknar, kann góðkenningin takast aftur. Somuleiðis kann góðkenningin takast aftur, um viðkomandi, sum hevur fingið góðkenning, er ikki førur fyri á hóskandi hátt at seta í verk ella halda fram við virkseminum.

§ 12. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer løgtingslóg nr. 61 frá 5. juni 1984 um ferðamannamiðstøð úr gildi.

Stk. 3. Bestyrelsen træffer i tvivlsspørgsmål afgørelse, om en virksomhed opfylder betingelserne i stk. 2.

Stk. 4. Lagtingslov nr. 33 af 20. december 1955 om næring m.v. med senere ændringer gælder også for dem, som driver rejsebureauvirksomhed.

§ 10. Autorisationen kan gives på bestemt tid og gøres afhængig af de vilkår, som skønnes påkrævet.

§ 11. Såfremt de meddelte vilkår ikke overholdes, kan autorisationen tilbagekaldes. Autorisationen kan ligeledes tilbagekaldes, om autorisationenens indehaver ikke er i stand til behørigt at iværksætte eller opretholde den tilladte virksomhed.

§ 12. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 61 af 5. juni 1984 om turistcentral.

Viðmerkingar:

Verandi lóg um ferðamannamiðstøð hevur nú verið í gildi í góð 5

ár. Leingi hevur verið ásannað, at hon hevur ikki virkað eftir ætlan. Orsøkirnar kunnu vera fleiri, at lógin hevur síni brek, eitt nú at stýrið er ov stórt, limirnir eru 7, og kanska er skeivt sett saman. Landsstýrið setti tí í apríl mánaði í ár ein arbeiðsbólk at endurskoða lóggávuna um ferðamannaviðurskifti við tí fyri eyga, at leggja uppskot fyri løgtingið í hesi tingsetuni.

Høvuðsbroytingin í mun til verandi lóg er, at í stýrinum skulu nú vera 3 limir, mótvegis teim verandi 7, og at landsstýrið velur teir allar. Ein onnur broyting er, at tey, sum reka ferðastovu, kunnu søkja um eina góðkenning ella løggilding til hetta frá ferðaráðnum. Endamálið verður skotið upp at broyta navnið frá Ferðamannamiðstøð Føroya til Ferðaráð Føroya.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1:
Landsstýrið heldur, at ein skynsamt rikin ferðavinna kann vera eitt gott ískoyti til samfelagsbúskapin. Av hesi orsøk er endamálið hjá Ferðaráð Føroya beinleiðis tikið við sum lógartekstur.

Til § 2:
Í mun til galdandi lóg eru hesar broytingar:
Nr. 8) er broytt nakað, so ferðaráðið nú skal skráseta tey gistingarpláss, sum eru í landinum, á einum teldukervi, samanber við nr. 12 niðanfyri. Endamálið er, at ferðaráðið eigur hon at hava umsorgan fyri, at sølan av hesum plássum verður samskipað. Skrásetast skulu einans tey pláss, sum lúka krøv ferðaráðsins til dygd, samanber nr. 9).

Skotið verður upp at skoyta í tvær nýggjar uppgávur hjá ferðaráðnum.

Sum nr. 12) verður skotið upp "at fylgja við teldu- og hentleikamenningini innan ferðavinnuna yvirhøvur og at veita neyðuga ráðgeving". Her verður hugsað um, at ferðaráðið eigur at virka fyri, at teldubúnaður kann samskipast millum t.d. ferðastovur, gistingarhús o.o. bæði innan- og uttanlands, so møguleiki er fyri

at gera landsfevnandi skráir til frama fyri føroysku ferða-vinnuna. Í hesum liggur eisini, at ferðaráðið skal ganga á odda, tá fylgjast skal við menningini á telduøkinum og menningini av øðrum hentleikum innan ferðavinnuna.

Sum nr. 13) verður skotið upp, at ferðaráðið skal "... virka fyri at tey, sum reka ferðastovur, seta á stovn ein trygdargrunn ferðavinnunnár". Hetta er fyri at tryggja tey ferðandi móti peningamissi, um ferðastova fer av knóranum. Ætlanin er, at tey, sum reka ferðastovurnar, skulu stovna og skjóta pening inn í trygdargrunnin.

Annars eru bara smávegis orðabroytingar gjørdar.

<u>Til § 3:</u>
Landsstýrið leggur stóran dent á, at arbeiðsgongdin hjá stjórnini fyri ferðaráðið kann vera skjót og smidlig. Við hesum í huga heldur landsstýrið, at talið á stýrislimum eigur at vera í mesta lagi tríggir. Við hesum verða eisini skaptir betri møguleikar fyri eini betri skipaðari arbeiðsgongd millum stýrið og stjóran fyri ferðaráðið.

Landsstýrið heldur, at stýrislimirnir ikki skulu vera beinleiðis partar í ferðavinnuni ella aktivir politikarar.

Umráðandi er annars, at í stýrinum eru fólk, sum
- í royndum hava víst ferðavinnuni ans/áhuga,
- hava búskaparliga fatan og innlit í ferðavinnuna,
- hava holla almenna vitan og kunnleika til samfelagsviðurskifti,
- hava evni til at sjóða saman mentan og fólkalív við ferðavinnuna,
- síggja álvaran í at varðveita umhvørvið í breiðastu merking.

<u>Tl. § 4:</u>
Í mun til verandi lóg verður her skotin upp tann broyting, at einki hámarkstal er fyri talið á límum í umboðsráðnum og at 4 ára valskeiðið verður avtíkið. Eisini er tann broyting skotin upp,

at umboðsráðsfundir skulu vera í minsta lagi 2 ferðir um árið í staðin fyri sum nú eina ferð um árið. Tey feløg, fyritøkur og stovnar, sum landsstýrið hevur givið rætt til at skjóta upp limir til umboðsráðið, gera sjálvi av, hvønn persón tey senda til teir einstøku fundirnar. Starvið sum umboðsráðslimur er ólønt. Útreiðslur til ferðing verða heldur ikki endurgoldnar av ferðaráðnum.

Í hjálagda skjali 1 er skrá yvir feløg, fyritøkur og stovnar, sum landsstýrið eigur at geva rætt til at skjóta upp lim í umboðsráðið. Skráin er ikki bindandi framyvir, men kann verða broytt av landsstýrinum, tá tað verður hildið neyðugt.

Til § 5:

Her er tann broyting, at skotið verður upp at skoyta uppí sum stk. 3, at stýrinum verður heimilað at gera reglugerð fyri stjóran.

Til §§ 6, 7 og 8:

Her eru ongar broytingar til verandi lóg.

Til § 9:

Landsstýrið heldur tað vera rættast, at møguleiki skal vera fyri at fáa eina góðkenning frá ferðaráðnum til at fara undir ferðastovuvinnu. Roynt gerður við hesum at hækka um stoðið í síni heild og álitið millum fólk til ferðastovur.

Teir, sum hava fingið góðkenning, eiga at kunna lýsa við, at teir hava góðkenning frá ferðaráðnum til ferðavinnuvirki og heldur landsstýrið, at ein tílík almenn góðkenning skuldi verið til frama fyri ferðastovurnar, tá tær hava samband við viðskiftafólk innanlands og ikki minst uttanlands.

Tá ferðaráðið skal taka avgerð um at geva góðkenning, eigur dentur at verða lagdur á fakliga førleikan og búskaparligu umstøðurnar hjá umsøkjaranum. Eisini eigur dentur at verða lagdur á fysisku umstøðurnar hjá umsøkjaranum. Annars er at siga, at

ferðaráðið eigur at gera eina ítøkiliga meting av hvørjari umsókn fyri seg.

Til §§ 10 og 11:

Vist verður á viðmerkingarnar til § 9 frammanfyri viðvíkjandi krøvunum til umsøkjararnar. Er stýrið fyri ferðaráðið í iva um góðkenning skal gevast, kann stýrið velja at góðkenna fyri eitt avmarkað tíðarskeið og haraftrat leggja tær treytir við góðkenningini, sum stýrið heldur vera neyðugar.

Ferðaráðið kann taka eina góðkenning aftur, um korini, sum hon er treytað av, verða ikki hildin. Eisini kann góðkenningin takast aftur, um ferðaráðið metir, at viðkomandi, sum hevur fingið hana, er ikki førur á hóskandi hátt at seta í verk ella halda áfram við virkseminum.

Signar Hansen
landsstýrismaður

/Eyðfinnur Jacobsen

Uppskot til lista yvir stovnar/felǿg, sum eiga rætt til lim í umboðsráðnum.

Bóndafelag Føroya

Felagið Klaksvík

Felagið Tórshavn

Føroya Ferðamannafelag

Flogfelag Føroya

Faroe Travel

Tora Tourist Traffic

Strandfaraskip Landsins

Smyril Line

Atlantic Airways

Bygdaleiðir

Samfylking

Føroya Gistingarhús Felag

Føroya Kommunufelag

Tórshavnar býráð

MBF

FNU

Søvnini á Debesartrøð

ÍSF

Jarðaráðið

Landsverkfrøðingurin

Føroyska Viðskiftastovan

Umboðsstovan í Aberdeen

Menningarstovan

Heimavirkini

Samferðsluráðið

Blaðmannafelagið

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 36/1989: Løgtingslóg um Ferðaráð Føroya.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 10. november 1989 og eftir 1. viðgerð 21. november beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og nevði tann 6. apríl 1990 fund við tríggjar bólkar, ið hava tilknýti til ferðamannavinnu- og virksemi:

Bólkur I: Flogfelag Føroya, Faroe Travel, Tora Tourist Traffic, Smyril Line og Atlantic Airways.

Bólkur II: Felagið Klaksvík, Felagið Tórshavn, Føroya Ferðamannafelag og Føroya Gistingarnústelag.

Bólkur III: Føroya Kommunufelag, Tórshavnar býráð, Menningarstovan og Samferðsluráðið.

Meirilutin (Edmund Joensen, Poul Michelsen og Heini O. Heinesen) vísir á, at sambært § 1, stk. 2 hevur Ferðaráð Føroya til endamáls at menna og skipa ferðavinnu í Føroyum, so hon gerst ein meira týðandi táttur í samfelagsbúskapinum og fjøltáttað vinnu- og samfelagslív til frama fyri livilíkindini og trivnaðin hjá teimum, sum her búgva. Tískil er Ferðaráð Føroya at skilja sum eigandi ein tíðandi tátt í stýringini av øllum tí øki, ið her verður lógarskipað sambært fyriliggjandi uppskoti soleiðis, at Ferðaráðið er tann hægsti stýrandi stovnur í hesum viðurskiftum.

Út frá hesum veruleika, sum landsstýrið ætlar at seta í verk, er tað tí meirilutans fatan, at tær sambært § 2 útgreinaðu uppgávur hjá Ferðaráðnum eftir uppskotinum ikki eru nóg væl orðaðar við tað at serliga punktini 7, 8, 9 og lutvís 10 eru av slíkum slag, at tey ikki eiga at liggja undir tí hægsta myndugleikanum á økinum, men heldur vera løgd til aðrar, fyri hvønn tað er ein náttúrlig arbeiðsuppgáva. Hetta eigur tí at verða broytt í neyðugt mát, so tað skilliga framgongur, hvørjar lógardefineraðar uppgávur, Ferðaráðið sum hægsti

stovnur skal hava.

Eftir § 2, stk. 4 í uppskoti landsstýrisins eru uppgávurnar hjá Ferðaráðnum hesar: "veita hjálp til áhugafelagsskapir kring landið, herundir stovnseting av avgreiðslum, har tað tykist neyðugt,". Meirilutin leggur dent á, at siktið við hesi grein er, at henda snýr seg um stovnan fyrst og fremst, meðan spurningurin um rakstur ikki kann verða tikin við í hesum spurningi.

Meirilutin kann ikki taka undir við § 3 í uppskotinum, har sagt verður, at fyri Ferðaráðnum situr stýrið við trimum limum, ið verða valdir av Føroya landsstýri. Meirilutin er av teirri áskoðan, at vinnan eigur at verða umboðað við tveimum límum, og skulu hesir veljast av tí sambært § 4 stovnsetta ráðgevandi umboðsráði, ið umboðar áhugamálini hjá ferðavinnuni. Meirilutin er sannførdir um, at tað tænir ferðavinnuni og landinum best, um tey, ið umboða vinnuna, verða vald í nóg stórt mát í Ferðaráðið til at røkja endamálsgreinina sambært fyriliggjandi lógaruppskoti, og er tí meirlutin samdir um, at annar av vinnuumboðunum skal umboða gistingarhúsbólkin og hin flutningsbólkin, her undir kunningarstovur. Meirilutin tekur undir við, at formaðurin verður valdur av landsstýrinum. Meirilutin er av teirri áskoðan at nærri reglur skulu ásetast viðvíkjandi hvussu teir bólkar skulu skipast í tilknýti til spurningin um val av limum í ferðaráðnum og mælt verður tí til at regla hesum viðvíkjandi verður sett í § 3 soleiðis at landsstýrið við kunngerð ger reglur hesum viðvíkjandi.

Í samband við viðmerkingarnar frá landsstýrinum til tær einstøku greinirnar, hevur landsstýrið viðvíkjandi § 3 sagt, at tað heldur, at stýrislimirnir ikki skulu verða beinleiðis partar í ferðavinnuni ella aktivir politikarar. Hesum kann meirilutin als ikki taka undir við og er av teirri áskoðan, at tað má vera eitt minstakrav, tá hvussu er, at ráðslimirnir sambært § 3 hava innlit í ferðavinnuna, á hvønn hátt tað so enn er.

Um valið av limunum í Ferðaráðnum, heldur meirilutin at tað má lógarfestast, at umboðsráðið fær eina heimild til at vejla teir tveir limirnar í Ferðaráðið, men við teirri avmarking, at ikki alt ráðgevandi umboðsráðið eigur hesa heimild sum

eigur at verða avmarkað eftir vekt og týdningi í ferðamanna-viðurskiftunum soleiðis, at í lógina skal setast regla um, hvørjir stovnar/feløg eiga rætt til at velja teir tveir limirnar í ferðaráðið. Sum høvuðsgrundgeving fyri slíkari reglu verður at tilskila tann vinnutýdningur, ið viðkomandi stovnur ella felag umboðar í samlaðu myndini.

Viðvíkjandi ráðgevandi umboðsráðnum sambart § 4 skal sum heild viðmerkjast, at meirilutin ásannar, at hetta ráð eigur at verða so væl umboðað, at tað er eitt náttúrligt mótspæl, til tess at øll viðkomandi áhugamál eru umboðað.

Meirilutin er ikki samdur við landsstýrið um §§ 9, 10 og 11, tí talan er her um nøkur taklig og teknisk fyribrigdi, sum tað er meir upp til teir einstøku vinnurekandi at liva upp til, heldur enn at tað er ein uppgáva fyri tann hægsta og fyriskipandi stovnin at taka sær av slíkum, tí hetta er ein spurningur um kapping og viðurkenning av einum fakligum støði, sum verður avgreitt á annan hátt. Víst kann vera á, at í útlondum eru ávís "klassingar" feløg og tílík, ið kanna viðurskiftini og geva stig fyri góðsku og annað, sum er leiðbeinandi fyri brúkaran og brúkarafeløgini. Mælt verður tí til, at hesar reglur verða tiknar burtur úr lógaruppskotinum. Sostatt setir meirilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 2 verða punktini 7, 8, 9 og 10 strikað og punktini 11, 12 og 13 verða punktini 7, 8 og 9.
2) § 3 stk. 1 verður soljóðandi:
"Fyri Ferðaráðnum situr stýrið við trimum limum

1) I § 2 udgår punkterne 7, 8, 9 og 10 og punkterne 11, 12 og 13 bliver punkterne 7, 8 og 9.
2) § 3 stk. 1 formuleres:
" Turistrådet ledes af en bestyrelse på 3 medlemmer der vælges således: 1 af Færøernes

ið verða valdir soleiðis: 1 av Føroya landsstýri ið er formaður. 1 av Føroya landsstýri eftir tilmæli frá flutningsfeløgunum her undir ferðamanna- og flutningsstovum ið skulu innstilla 3 evni, og 1 valdur av gistingarhúsfelagnum.

3) §§ 9, 10 og 11 verða strikaðar.

4) § 12 verður § 9.

landsstyre, 1 af Færøernes landsstyre efter indstilling fra transportselskabene, herunder turist- og informationskontorer der skal indstille 3 kandidater og 1 valgt af hotelforeningen.

3) §§ 9, 10 og 11 udgår.

4) § 12 bliver § 9.

Ein minniluti (Vilhelm Johannesen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Niels Pauli Danielsen) tekur støðu í tingsalinum.

ÍDNAÐARNEVNDIN, 26. mai 1990.

Edmund Joensen John Petersen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Vilhelm Johannesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 21. november 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari)

Tlf. 11020 . Telex 81310 lagta fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, laygardag stongt
NÁV/or

Føroya Løgting.

løgtingsmál nr. 37/1989: Broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vektavgjald av motorakførum v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um vektgjald av motorakførum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:
Í § 3, pkt. A, B og C verða gjørdar hesar broytingar í útjavningargjaldinum:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om vægtafgift på motorkøretøjer m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 38 af 31. marts 1982 om vægtafgift på motorkøretøjer m.v. foretages følgende ændringer:
I § 3, pkt. A, B og C foretages følgende ændringer i udligningsafgiften:

	Útjavningargjald Udligningsafgift Kr.
A. Persónvognar, tó ikki bussar og hýruvognar Personbiler, bortset fra busser og hyrevogne	
601 - 800 kg eginvekt egenvægt	897,00
801 - 1100 "	1.118,00
1101 - 1300 "	1.504,00
1301 - 1500 "	2.029,00
1501 - 2000 "	2.622,00
yvir 2000 " over	3.629,00

B. Hýruvognar		
Hyrevogne		
upp til 800 kg eginvekt		
inntil 800 kg egenvægt		5.382,00
801 - 1100	"	6.734,00
1101 - 1300	"	8.073,00
1301 - 1500	"	8.749,00
yvir 1500 over	"	9.425,00
C. Motorsúkklur		
Motorcykler		304,00

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1990.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1990.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 66 frá 3. juli 1989 var bensingjaldið broytt frá 2,75 kr. til 3,75 kr. fyri hvønn litur.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið varð tá nevnt, at neyðugt fór at verða at broyta útjavningargjaldið fyri dieselvognar.

Lógarbroytingin miðaði ímóti at útvega inntøkur til landskassan, tí er neyðugt at broyta útjavningargjaldið, so at dieselbilar fáa ikki ósanngjarna fyrimun mótvegis bensindrivnum bilum.

Tá hetta ikki varð broytt samstundis, var tað tí, at rokningarnar fyri vakthjald av motorakførum fyri seinna hálvár 1989 vóru sendar út, tá løgtingslóg nr. 66 varð løgd fyri tingið.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 37/1989: Broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum.

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 21. november 1989 og eftir 1. viðgerð 24. november beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur tann 4. december havt fund við umboð fyri gjaldstovuna og bileftirlitið.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og eitt minniluta.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Eilif Samuelsen og Heini O. Heinesen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Atli P. Dam og Tórbjørn Poulsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og setir einki uppskot fram.

SKATTANEVNDIN, 5. december 1989.

Jógvan við Keldu Eilif Samuelsen Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 24. november 1989

Tlf. 11080 . Telex 81310 tinges fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, laygardag mangt
FTS/or

F. L. j. nr. 2116-1-1
(at tilskila í svari)

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 38/1989: Lóg um "Statens Uddannelsesstøtte".

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at lóg nr. 357 frá 4. juni 1986 "Om Statens Uddannelsesstøtte" og kunngerð nr. 159 frá 31. mars 1987 "Om Uddannelsesstøtte" verða settar í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:

Lógirnar hava verið fyrilagdar løgtinginum á sumri 1987, men av onkrari orsøk vóru tær ikki kunngjørdar.

Statens Uddannelsesstøtte avgjørdi tó, at útgjalda stuðul til tey lesandi í teirri trúgv, at lógin og kunngerðin vórðu sett í gildi fyri Føroyar. Hetta hendi sum sagt ikki, og sostatt hevur S.U. útgoldið stuðul og lán uttan lógarheimild.

Á fundi tann 26. oktober 1989 við ríkisumboðið møtti Tommy Jensen, fulltrúi, og greiddi frá støðuni.

Fört varð fram, at lógin frá 1986 og kunngerðin frá 1987 bert

skuldu lýsast og vera í gildi eina stutta tíð fyri at fáa heimildina uppá pláss.

Seinni skuldi so lóg nr. 723 frá 18. november "Lov om ændring af forskellige love om Færøernes undervisningsvæsen" lýsast av nýggjum, soleiðis at tað greitt framgongur, at áðurnevnda lóg frá 1986 og kunngerð frá 1987 ikki eru galdandi fyri Føroyar.

Mælt verður Førcya Løgtingi til at góðkenna viðlagda uppskot.

Signar Hansen
landsstýrismaður

/ Eyðfinnur Jacobsen

Á l i t

í

lógtingsmáli nr. 38/1989: Lóg um "Statens Uddannelsesstotte".

Landsstýrið legði málið fram 24. november 1989 og eftir 1. viðgerð 5. desember 1989 varð tað beint í mentunar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt uppskotið og ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

MENTUNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 16.februar 1990.

Eilif Samuelsen — Hergeir Nielsen — Jógvan á Lakjuna

Jógvan A. Johannesen — Törbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080. Telex 81310 tinget fa. Telefax 14941. Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15. leygardag stongt

12. desember 1989

F. L. j. nr. 421-1-10
(at tilskila í svari)

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 39/1989: Broyting í lóg um innflutningsgjøld.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður pkt. 3.12 broytt soleiðis:
"11,50 kr." verður broytt til: "12,75 kr." og "17,00 kr." verður broytt til: "18,25 kr."

2) Í § 1, pkt. 3.13 verður "2,5 rúmprosent" broytt til: "0,5 rúmprosent".

3) Í § 7 verður sett sum nýtt stk. 3:
"Føroya Tollstova kann krevja trygd frá skipaavgreiðslum og øðrum flutn-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgifter m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.v. foretages følgende ændringer:

1) I § 1 ændres pkt. 3.12 således:
"11,50 kr." ændres til "12,75 kr." og "17,00 kr." ændres til "18,25 kr."

2) I § 1, pkt. 3.13 ændres "2,5 rumprocent" til: "0,5 rumprocent".

3) I § 7 indsættes som nyt stk. 3:
"Føroya Tollstova kan forlange sikkerhed fra skibsselskaber og andre transportselskaber for told af

ingsfelǿgum fyri toll á vørum, ið verða útflýggjaðar uttan loyvi frá Tollstovuni."

varer, der udleveres uden toldkontorets tilladelse."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Orsøkin til broytingarnar í § 1, pkt. 1 er, at feilur var komin í, tá lógin varð kunngjørd, soleiðis at lógin fyrisetur, at danskt øl fær hægri gjald pr. litur enn annað útlendskt øl. Broytingin í pkt. 2 er orsakað av, at sodavatnslíknandi drykkur við alkoholinnihaldi er komin í handlarnar.

Alkoholinnihaldið í hesum drykki liggur uppímóti styrkini á øli í skattaklassa II (2,25 vekt%). Tí er neyðugt at broyta lógina, soleiðis at hædd verður tikin fyri hesum drykki.

Í alheimsreglunum er markið fyri alkoholfríar drykkjuvørur í mesta lagi 0,5 rúm % alkohol. Broytingin í pkt. 3.13 merkir, at drykkjuvørur við alkoholinnihaldi yvir 0.5 rúmprosent fella undir 3.01-3.09 eftir styrki og slag. Soleiðis verða drykkjuvøra, ið er komin til landið í seinastuni, við alkoholinnihaldi umleið 2,50 rúmprosent, at tolla undir pkt. 3.08.

Broytingin í pkt. 6 viðvíkjandi § 7 verður gjørd, tí at skípa- og vøruavgreiðslur alt ov ofta útflýggja vørur uttan at vørurnar eru tollgreiddar og útflýggingarloyvi er givið frá Tollstovuni.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/ Jalgrim Hilduberg

A l i t

í

løgtingsmáli nr. 39/1989: Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 12. december 1989 og eftir 1. viðgerð 15. december 1989 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó er nevndin samd um, at í § 1 í uppskoti landsstýrisins átti at staðið: "Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum", tá henda lóg er so ofta broytt. Eisini er í landsstýrisins uppskoti í tí danska tekstinum í § 1, pkt. 1) komið at standa "18,75 kr." í staðin fyri "18,25 kr.", og er hetta bert eitt misstak. Í § 1, pkt. 3) verður orðið "Tollstovuni" broytt til "tollvaldinum" og í danska tekstinum "toldkontorets" til "toldvæsenets". Samsvarandi hesum setir nevndin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1 verður aftaná orðini "Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950" sett: "við seinni broytingum".
2) Óbroytt.
3) Í § 1, pkt. 3 verður orðið "Tollstovuni" broytt til: "tollvaldinum".

1) I § 1 indsættes efter ordene "I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950": "med senere ændringer".
2) I § 1, pkt. 1 udgår "18,75 kr." og erstattes af "18,25 kr."
3) I § 1, pkt. 3 ændres ordet "toldkontorets" til: "toldvæsenets".

SKATTANEVNDIN, 31. januar 1990.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauga Heine O. Heinesen

Tórbjørn Poulsen Vilhelm Johannesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 12. desember 1989

TIL 11010 . Telex 81310 tinges fa . Telefax 14943 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: KL. 10—15. leygardag stongt

F. L. j. nr. 421-1-10
(at tilskila í svari)

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 40/1989: Broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 um serligt innflutningsgjald verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Undantiknar frá innflutningsgjaldinum eru hesar vørur: Rug, hveiti, bygg, havragrýn, sukur, groft salt og annað salt í stórpakningi, fóðurevni (tó ikki fóðurevni til hundar, kettur, stovufuglar, akvariufiskar o.t. húsdýr), kol, koks, cinders, petroleum, benzin, brennioljа, smyrjiolja, gass,

lagtingslov om ændring i lagtingslov om særlig indførselsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 om særlig indførselsafgift foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 1 affattes således:
"Fritaget for indførselsafgiften er følgende varer:
"Rug, hvede, byg, havregryn, sukker, grovt salt og andet salt i storpakning, foderstoffer (dog ikke foderstoffer til hunde, katte, stuefugle, akvariefisk, o.lign. husdyr), kul, koks, cinders, petroleum, benzin, brænd-

í § 2, stk. 2, pkt. 2 verður skoytt uppí "herundir impregneringsveska". Hetta er vøra, ið verður nýtt í sambandi við framleiðslu av alinótum eins og til viðgerð av nótum, ið hava verið í nýtslu.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 40/1989: Broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 12. december 1989 og eftir 1. viðgerð 15. december 1989 beint í skattanevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men vísir á, at í § 1 í uppskoti landsstýrisins átti at staðið: "Í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum", tá henda lóg er so ofta broytt, og at orðingin í § 1, pkt. 1 í landsstýrisins uppskoti: "Rug, hveiti o.s.fr." ikki er nóg greið at tolla rávørur til bakarar eftir. M.a. er ikki sagt, um her er talan um korn ella um mjøl ella um bæði korn og mjøl. Heraftrat kemur, at bakarar nú á døgum í stóran mun keypa rávørurnar í teirri blanding, ið hóskar til ymisk sløg av bakstri. Herundir eisini blandingar av mjøli og heilum ella knústum korni, eisini við ymiskum tilsetingarevnum.

Skulu hesar rávørur til bakarar framvegis verða frítiknar fyri serligt innflutningsgjald, er neyðugt at nútíðargera tekstin. Í uppskotinum er sett fram regla um stórpakking. Varður hetta samtykt, merkir tað, at mjøl, havragrýn, sukur o.s.fr. í smásølupakkum fer at verða tollað við 33%, meðan hesar vørur sambært núverandi teksti bert verða tollaðar við 6% (eykainnflutningsgjald). Samsvarandi hesum setir samd skattanevnd fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1 verður aftaná orðini "Í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961" sett: "við seinni broytingum".
2) § 1, pkt. 1) verður orðað soleiðis:
"Undantiknar frá innflutningsgjaldinum eru hesar vørur:
Korn og mylnuúrdráttir, herundir mjøl og kornblandingar og sukur. Grovt salt og annað salt í stórpakningi (yvir 5 kg), fóðurevni (tó ikki fóðurevni til hundar, kettur, stovufuglar, akvariufiskar o.t. húsdýr) kol, koks, cinders, petroleum, bensin, brenniolja, smyrjiolja, gass, skip og bátar 5 GT og størri (tó ikki stuttleikafør), flogfør og tyrlur, tunnustavar, gávupakkar, medisinvørur, prentpappír, bøkur og bløð (tó ikki prentlutír av sølufremjandi slag)."

1) I § 1 indsættes efter ordene "I lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961": "med senere ændringer".
2) § 1, pkt. 1) affattes således:
"Fritaget for indførselsafgiften er følgende varer:
"Korn og melleriprodukter, herunder mel og kornblandinger og sukker. Groft salt og andet salt i storpakning (over 5 kg), foderstoffer til hunde, katte, stuefugle, akvariefisk o.lign. husdyr) kul, koks, cinders, petroleum, benzin, brændselsolie, smøreolie, gas, skibe og både 5 GT og derover (dog ikke lystfartøjer), fly og helikoptere, tøndestave, gavepakker, medicinalvarer, trykpapir, bøger og blade (dog ikke salgsbrochurer og lignende)."
3) I pkt. 2) ændres ordet:

3) Í pkt. 2) verður orðið "impregneringsløgur" broytt til: "impregneringarevni".

"imprægneringsvæske" til: "imprægneringsmiddel".

SKATTANEVNDIN, 12. februar 1990.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heine C. Heinesen

Tórbjørn Poulsen Vilhelm Johannesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 12. desember 1989

Tlf. 11080 . Telex 81310 tlogmx fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Arbeiðstíðir: Kl. 10—15, leygardag stongt

F. L. j. nr. 421-1-10
(at tilskila í svari)

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 41/1989: Broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 um eyka innflutningsgjald verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2 verður orðingin "Skip yvir 20 br.reg. tons, tó ikki lystskip" broytt til: "Skip yvir 20 GT (tó ikki stuttleikafør)".
2) Í § 2 verður sum nýtt stk. 2 sett:
"Undantikið frá eykainnflutningsgjaldinum er eisini:
1) Togverk, wirur og tilfar til hesi.
2) Fiskilínur, fiski-

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om ekstra indførselsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 af 19. mai 1979 om ekstra indførselsafgift foretages følgende ændringer:

1) I § 2 ændres "Skibe over 20 br.reg.tons, dog ikke lystskibe" til: "Skibe over 20 GT (dog ikke lystskibe)".
2) I § 2 indsættes som nyt stk. 2:
"Undtaget for indførselsafgiften i henhold til denne lov er endvidere:
1) Tovværk, wirer samt stoffer til sådanne.
2) Fiskeliner, fiskesnører, forfang, garn,

snørir, teymar, gørn, nótir og tilfar til hesi, herundir impregneringsløgur.

3) Húkar, flot, fiskilodd, søkk o.t.

4) Trol og tilfar til hesi, lemmar, bobbens, sjeklar, trolhúðir o.t.

5) Ílat og tilfar til pakkingar av fiski og sild sum t.d. kassar til fisk, konservesdósir, lýsitunnur, sildatunnur, gjarðir o.t., dósir til flak, rogn o.t., hessian í longdum og posum, seyldúkar, seylgarn, bond, plombur, oceanpappír o.t."

6) Brenniolja og petroleum.

7) Grovt salt og annað salt í stórpakningi.

3) § 9 verður strikað.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

not, samt stoffer til sådanne, herunder imprægneringsvæske.

3) Fiskekroge, bøjer, fiskelod samt sænk o.l.

4) Trawl samt stoffer til sådanne, lemme, bobbens, sjækler, trawlhuder o.l.

5) Emballage samt stoffer til emballering af fisk samt sild som f.eks. kasser til fisk, konservesdåser, tønder til tran og sild, tøndebånd o.l., dåser til filéter, rogn o.l., hessian i længder og sække, sejldug samt sejlgarn, bånd, plomber, oceanpapir o.l.

6) Brændselsolie og petroleum.

7) Groft salt og andet salt i storpakning.

3) § 9 udgår.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Í § 1, pkt. 1 verður BRT broytt til GT. Orsøkin til hetta er, at øll nýggj skip og vør verða máld upp eftir millumlanda sáttmálanum frá 1969 og fáa ásett eina bruttotonnagu (GT) sambært løgtingslóg nr. 90 frá 10. juni 1982 um skipauppmáling. Fram til 18. juli 1992 kann skipa/bátaeigari biðja um at fáa uppmátingina

tjørda eftir 1954-málireglunum og harumframt fáa ásett eina BRT-tonnagu.

Eftirsum tollløggávan bert nýtir BRT-mál, verður mælt til at broyta til GT-tonnagu einans.

GT-tonnagan er altíð størri enn BRT-tonnagan, tó er bert lítil munur á støddini 5 og 20 tons.

Við broytingini í § 1, pkt. 2, nr. 1-5 verður ymisk útgerð og tilfar til fiskivinnu og fiskifdnað undantikin frá eykainnflutningsgjaldinum.

Tlanin við broytingini er, at veita fiskivinnuni lætta fyri útgerð. Eisini at geva fiskifdnaðinum vørur, ið verða nýttar til framleiðslu av útflutningsvørum. Broytingin merkir eisini, at brenniolja til húsarhald gerst nakað bíligari, í meðal 200-400 kr. fyri hvørt húski um árið.

Heimild til at veita endurgjald fyri pakkitilfar o.a. til útflutningsvørur er í dag í tollløgini § 8, stk. 3, men henda heimild hevur higartil ikki verið nýtt til at endurgjalda eyka innflutningsgjaldið.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 41/1989: Broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjald.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 12. december 1989 og eftir 1. viðgerð 15. december beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini innkallað Leivur Gregersen, stjóra á Føroya Tollstovu og Uffa Ærentsen, formann í Føroya Íðnaðarfelag.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Nevndin er samd um, at í § 1 í uppskoti landsstýrisins átti at staðið: "Í løgtingslóg nr. 32 frá 19. februar 1979 við seinni broytingum", tá hesa lóg er so ofta broytt, og setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður aftaná orðini "Í løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979" sett: "við seinni broytingum".

I § 1 indsættes efter ordene "I lagtingslov nr. 32 af 19. mai 1979": sett: "med senere ændringer".

Meirilutin er samd um, at alivinnan og íðnaðarfyritøkurnar eiga at verða javnstillaðar við fiskivinnuna, tá tað snýr seg um innflutning av rávøru, og at givið verður rávøruloyvi eftir umsókn, sum tollvaldið hevur gjørt sambært kunn-

gerð nr. 11 frá 19. mars 1973, og verð samsvarandi hesum samtykt at seta fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at geva rávøruloyvi í staðin fyri endurgjald fyri eykainnflutningsgjaldið.

Minnilutin (Tórbjørn Poulsen og Vilhelm Johannesen) vísir á, at uppskot landsstýrisins ikki er arbeiðsskapandi, tá tað hvørki eggjar til størri framleiðslu ella størri fyritaksemi heima í Føroyum.

Tvørturímóti hevur uppskotið til endamáls at veita ein lætta til tey, sum innflyta og selja útlendska framleiðslu, ið vit annaðhvørt framleiða ella kunnu framleiða. Avleiðingin verður minni arbeiði og størri innflutningur. Størri hall á handilsjavnanum og størri gjaldsjavnahall.

Eftir uppskotinum verður ymisk útgerð og ymiskt tilfar til fiskivinnuna og fiskiíðnaðin frítikin fyri eykainnflutningsgjald. Í sínum áliti mælir meirilutin í skattanevndini (samgonguflokkarnir) til, at útgerð og tilfar til alivinnuna skulu fáa somu sømdir, sum útgerð og tilfar til fiskivinnuna og fiskaíðnaðin.

Tað er øllum greitt, at vit í stóran mun framleiða hesa útgerð og hetta tilfar sjálvir, og í teimum førum, hetta ikki verður gjørt, er hugsandi, at vit kunnu fara undir framleiðslu, um føroysk framleiðsla fær nóg góðar sømdir. Men eftir hesum uppskotinum verður føroysk framleiðsla munandi verri fyrí enn útlendska framleiðslan, sum vit skulu kappast við.

Taka vit fiskivinnuna, so framleiða vit t.d. fiskilínur, fiskisnøri, snellur, teymar, gørn, nótir, fiskilodd, søkk, trol, lemmar, flotkúlur o.s.fr. Taka vit alivinnuna, er tað

sama galdandi. Vit framleiða flotbúr av ymiskum slag (eisini teir ymisku komponentarnar) vit framleiða fóður, fóðurautomatir, fóðurbátar o.s.fr. Tá talan er um fiskiídnaðin, framleiða vit edv-útgerð, pakkitilfar, fiskakassar o.s.fr.

Út frá hesum kann minnilutin ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins. Sin avtøka av eykainnflutningsgjaldinum á tí rávøru, sum verður nýtt til framleiðslu í Føroyum, vildi tænt ídnaðinum, fiskivinnuni, fiskiídnaðinum og alivinnuni eins og samfelagsbúskapinum.

Minnilutin mælir til, at málið verður beint aftur í skattanevndina, har tað eigur at fáa nýggja viðgerð í samráð við Menningarstovuna og Føroya Ídnaðarfelag.

SKATTANEVNDIN, 12. februar 1990.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heine O. Heinesen

Tórbjørn Poulsen Vilhelm Johannesen

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 42/1969: Førovar serstakt biskupsdømi.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið heitir á donsku stjórnina at skipa so fyri, at Førovar verða serstakt biskupsdømi.

Viðmerkingar:

Tíðin tykist ikki vera komin, at vit skulu yvirtaka fólkakirkjuna sum føroyskt sermál.

Hin vegin átti einki at verið til hindurs fyri, at Førovar gerast serstakt biskupsdømi.

Í yvirlitinum yvir lógamál, sum forsætismálaráðharrin legði fyri fólkatingið, tá hetta seinast varð sett, og sum ætlanin er, skulu fremjast í hesi tingsetu, var m.o. uppskot um at skipa Grønland sum serstakt biskupsdømi.

Tað átti at verið sjálvsagt, at hesar sømdir eisini verða vístar okkum føroyingum.

Á FØROYA LØGTINGI, 21. november 1989.

Tórbjørn Poulsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 42/1989: Føroyar serstakt biskupsdømi.

Sjálvstýrisflokkurin legði málið fram tann 21. november 1989 og eftir 1. viðgerð 5. december beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og undir viðgerðini gjørdi uppskotsstillarin vart við, at tað var ikki beinur framferðarháttur, at løgtingið heitir á donsku stjórnina, men at heitt átti at verið á landsstýrið um at skipa fyri, at Føroyar verða serstakt biskupsdømi.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eilif Samuelsen, Hergeir Nielsen og Jógvan á Lakjuni) førir fram, at landsstýrið longu er komið nakað ávegis í samráðingunum við donsku ríkisstjórnina um at loysa hetta málið, og setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Tórbjørn Poulsen og Jógvan A. Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskot sjálvstýrisins um at gera Føroyar til serstakt biskupsdømi varð lagt fram 21. november 1989 og eftir 1. viðgerð 5. december 1989 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Annan dagin eftir 1. viðgerð í tinginum, hin 7. december 1989, samtykkir landsstýrið at virka fyri, at Føroyar gerast serstakt biskupsdømi.

Í brævi dagfest 9. februar 1990 heitir landsstýrið á ríkisumboðsmannin um at venda sær til kirkjumálaráðið til tess at seta hesa samtykt landsstýrisins í verk og soleiðis, at Føroyar gerast eitt stift fyri seg, og at starvið sum varabiskuppur verður at broyta til biskupp.

Uttan mun til, um uppskot sjálvstýrisfloksins verður samtykt á tingi ella tað verður felt, og hóast tað í uppskotinum til samtyktar er gjørdur ein formellur feilur, so hevur tað vunnið frama kortini og var sostatt ikki lagt fram til fánýtis.

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 21. februar 1990.

Lasse Klein — Jógvan A. Johannesen — Hergeir Nielsen

Jógvan á Lakjuni — Eilif Samuelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn 12. desember 1989

F. L. j. nr. 427-2-8-1

Tlf. 11080 . Telex 81310 tingns fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt
NÁV/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 43/1989: Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald á motorakførum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 12 verða sum nýggj stk. 2, stk. 3, stk. 4 og stk. 5 sett:

"Stk. 2. Fyri brúktar persónvognar verður virðisgrundarlagið uppgjørt eftir § 2 eftir fakturavirði á persónvognunum sum nýggjur, niðurskrivað við 10% fyri hvørt árið, men tó ongantíð niður um 20%.

Stk. 3. Tað er ein treyt fyri at skráseta persónvogn eftir stk. 2, at hann verður skrásettur til egna nýtslu og hevur verið endaliga skrásettur í egnum navni í tí landinum, flutt verður úr.

Stk. 4. Skiftir persónvognur eigara áðrenn 1 ár eftir skráseting, kemur hann undir skrásetingargjald.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om registreringsafgift på motorkøretøjer.

§ 1.

I lagtingslov nr. 102 af 1. oktober 1986 om registreringsafgift på motorkøretøjer m.v. foretages følgende ændringer:

I § 12 indsættes som nyt stk. 2 og stk. 3:

"Stk. 2. Værdigrundlaget for brugte personvogne fastsættes efter § 2 på grundlag af fakturaværdien af personvognen som ny, nedskrevet med 10% for hvert år, men dog aldrig under 20%.

Stk. 3. Det er en betingelse for registrering af personvogn efter stk. 2, at denne registreres til eget brug og at den har været endelig registreret i eget navn i det land, der flyttes fra.

Stk. 4. Skifter personvogn ejer inden 1 år efter registrering , kommer den under registreringsafgift.

Stk. 5. Motorkøretøjer på grænseplader betragtes som

Stk. 5. Motorakfør við marknaplátum verða at rokna sum nýgg akfør.	nye.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	**§ 2.** Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Við kunngerð nr. 62 frá 3. juni 1989 um skrásetingargjald á motorakførum sum flytigóðs, vórðu reglurnar munandi herdar.

Tað er ikki longur møguligt at innflyta persónbil sum flytigóðs aftaná at hava búð bert eitt ár uttanlands (tó undantikið Danmark).

Eftir galdandi reglum skulu allir persónbilar, sum eigarin flytir við sær higar til landið, og sum ikki uppfylla treytirnar í flytigóðsreglunum, tollast við 33% av virðinum og rinda skrásetingargjald av ikki minni enn 90% av nýprísinum fyri bilin.

Tað kann ikki vera rætt, at fólk, sum hava búð uttanlands eina tíð og t.d. nava ein gamlan bil aftur við sír, skulu noyðast at skráseta hann við 90% av tí virði, bilurin hevði sum nýggjur.

Við hesi broyting verður ikki skaptur møguleiki fyri spekulatión, tí at vektargjaldið verður ikki brøytt.

Eisini eigur at verða nevnt, at henda broyting bert umfatar bilar, sum fólk, sum fluta til Føroyar hava við sær. Um so er, at brúktir bilar verða innfluttir uttan at uppfylla treytirnar í § 1, stk. 2 í hesi lóg, so verða hesir tollaðir sambært § 12 í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald av motorakførum v.m. Tó skal viðmerkjast at bilar, sum verða innfluttir við marknaplátum, verða roknaðir sum nýggir.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/ Jalgrim Hilduberg

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURÐS-OG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 44 /1989: Fyribyrgjandi tiltøk í samband við dálking av firðum,sundum og vøtnum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at skunda undir at tiltøk, ið minka um dálkingina av firðum, sundum og vøtnum verða sett í verk.

Viðmerkingar:

Á vári 1987 samtykti Føroya løgting, at landsstýrið skuldi fáa gjørt uppskot um og kostnaðarmeting av tiltøkum, ið høvdu til endamáls at minka um dálkingina av okkara firðum, sundum og vøtnum.

Síðan tá, er nýggj umhvørvislóg lýst, har henda m.a. eisini heimilar landsstýrinum at fremja kortleggingar av dálkingarstøðuni og trýsti frá teim einstøku dálkingarkeldum á áir, løkir, vøtn og partar av føroyskum sjóøki.

Hóast áðurnevndu samtykt og heimildir í umhvørvislógini, má ásannast at dálkingarvandin av okkara firðum ikki í nóg stóran mun er tikin í álvara av landsins myndugleikum.

Kommunur kring landið hava fleiri ferðir gjørt vart við og søkt um stuðul í samband við at minka um dálkingarvandan. Tær hava vilja men ikki megnað orsakað kostnaðin.

Tey seinru árini er ein støðug útbygging farin fram innan alivinnuna.

Mangir firðir t.d. Skálafjørðurin og mong sund t.d. Sundalagið eru vorðin týðandi karmur um hesa vinnu,og eiga tí dálkingarkeldur stavandi frá húsarhaldum, virkjum v.m. í størst møguligan muna at minka.

Á l i t

í

<u>løgtingsmáli nr. 44/1989: Fyribyrgjandi tiltøk í samband við dálking av firðum, sundum og vøtnum.</u>

Málið er framlagt av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 12. december 1989 og eftir 1. viðgerð 19. december beint í umhvørvisnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri stovnar og serfrøðingar í slíkum spurningum.

Álitið frá landsverkfrøðinginumstovninum um firðir, nýtslu og dálking er nú komið, og upplýst verður, at nevnd er sett og væl áleið komið við gerð av reglugerðum og arbeiðs- og ábyrgdarbýti í umhvørvismálum.

Meirilutin (Eliesar Arge, Edmund Joensen og Finnbogi Ísakson) setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Marita Petersen og Lasse Klein) vísir á, at nú skjótt tvey ár eftir, at løgtingið viðtók eina nýggja lóg um vernd av umhvørvinum, er lógin ikki enn farin at virka, tí tær neyðugu reglugerðirnar til umsiting av lógini ikki eru gjørdar.

Politikkurin hjá samgonguni á hesum økinum vísir heldur ikki tann stóra viljan at fáa gongd á hetta arbeiði, tí játtanin á figgjarlógini til umhvørvisumsiting er so lítil, at einki kann gerast fyri hendan pening.

Eitt reint umhvørvi er fyritreytin fyri, at vit kunnu lívbjarga okkum her í Føroyum, tí kann ikki drálast longur við hesum málum.

Minnilutin mælir løgtinginum til at taka undir við uppskotinum.

UMHVØRVISNEVNDIN, 27. apríl 1990.

Eliesar Arge Edmund Joensen Finnbogi Ísakson

Marita Petersen Lasse Klein

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

19. desember 1989

F. L. j. nr. 1216-1
(at tilskila í svari)

Tlf. 11080 . Telex 81318 finpas is . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt
JøH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 45/1989: Lóg um egnsudvikling.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at mæla ríkisstýrinum til at lóg nr. 221 frá 13. apríl 1988 "om egnsudvikling" verður lýst at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur í skrivi dagfest 11. oktober 1988 sett heimastýrinum fyrispurning, um tað hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 221 frá 13. apríl 1988 "om egnsudvikling" verður lýst at galda í Føroyum smb. lóg nr. 51 frá 1. apríl 1896 "om kundgørelse af love og anordninger på Færøerne."

Nýggja danska lógin um landspartsútbygging, nr. 221 frá 13. apríl 1988, kemur í staðin fyri gomlu lógina nr. 88 frá 25. mars 1985.

Studningurin er avmarkaður til nýstovnað virkir og virkir, sum byrja eina nýggja framleiðslu og til fyrstu størri víðkan av smærri virkjum. Tó kunnu kommunur støðugt fáa lán til iðnaðarbygningar.

Eisini kann studningur veitast til konsulenthjálp.

Til nýtslu í 1989 eru avsettar 84 mió. kr. og í 1990 73 mió. kr. Føroysk virkir fingu 3,5 mió. kr. í 1988 og 1,5 mió. kr. í 1987. Annars verður vist til viðmerkingarnar hjá industriministaranum.

Olaf Olsen

landsstýrismaður

/Kjartan Hoydal

KRISTILIGI FOLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURDS- OG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 46/1989: Um útgjalding av løn og stuðningi til fiski- og útróðrarmannin í einum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum skjótast gjørligt at finna útvegir fyri, at fiski- og útróðrarmaðurin kann fáa løn sína (fiskipart og prísískoyti) útgoldna í einum.

Viðmerkingar:

Undanfarna landsstýrið, sum bert kom at sita nakrar mánaðir, var farið í holt við erbeiðið at útvega fiski- og útróðrarmonnunum tey sjálvsøgdu rættindi at fáa lønina útgoldna í einum. Hetta er galdandi fyri allar aðrar stættir í samfelagnum.

Fiski- og útróðrarmaðurin hevur verið noyddur til at bíða í mánaðir eftir tí parti av løn sini, sum koma skal í gjøgnum Lønjavningargrunnin, tí at pengar hava eingi verið at tikið av. Á tann hátt er tað altíð fiski- og útróðrarmaðurin, sum merkir tað, tá ið fjarðar í landskassanum, og lítið er at gjalda við.

Síðan lógirnar um hegru avgjold og bundna samanspæring seinna helming av árinum fóru at virka av álvara, hevur tað verið trongligt hjá mongum, ikki minst hjá teimum, ið hava virksemi sitt á sjónum og ógvuliga ójavna inntøku.

Tað kann ikki vera rætt, at tann vinnuvegur, ið er

høvuðsgrundarlag okkara, fiskivinnan, er so illa fyri, at teir sum virka á sjónum, veiða og flyta fongin til lands, fáa úrtøku sína í fleiri pørtum og noyðast at bíða í langa tíð, áðrenn øll lønin kemur teimum í hendur. Teir hava eisini sínar skyldur at greiða á landi og sleppa ikki lagaligari enn onnur.

Tí eiga hesi viðurskifti at verða fingin í rættlag skjótast gjørligt.

Á FØROYA LØGTINGI, 19. december 1989

Niels Pauli Danielsen

A l i t

í

løgtingsmáli nr. 46/1969: Um útgjalding av løn og studningi til fiski- og útróðrarmannin í einum.

Málið er framlagt av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 19. desember 1989 og eftir 1. viðgerð 24. januar 1990 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Jógvan Durhuus, Petur Reinert, Suni Jacobsen og Jákup Lamhauge) vísir á samgonguskjalið hjá sitandi samgonguni, har tikið verður soleiðis til: "Afturberingin úr landskassanum til skip og manning verður avroknað og útgoldin saman við avreiðingini". Eisini vísir meirilutin á uppritið um nýggja fiskivinnupolitikkin har boðað verður frá stórum broytingum í afturberingarskipanini. Meirilutin tekur sostatt ikki undir við uppskotinum soleiðis sum tað fyriliggur og setir eínki uppskot fram.

Minnilutin (Henrik Old og Tórbjørn Poulsen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot Kristiliga fólkaflokksins, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokks.

FISKIVINNUNEVNDIN 3. apríl 1990.

Svend Aage Ellefsen | Jógvan Durhuus | Petur Reinert

Suni Jacobsen | Jákup Lamhauge | Henrik Old

Tórbjørn Poulsen

KRISTILIGI FOLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURÐS- OG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 47/1989: Um skatting av hjúnum við helvtarbýti.

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum skjótast gjørligt at leggja fyri løgtingið uppskot um broyting í skattalógini, soleiðis at heimaarbeiðandi hjúnafelagin verður skattaður við helminginum av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum.

Viðmerkingar

Landsstýrið 1985-1988 arbeiddi við spurninginum um at álíkna hjún við helvtarbýti av samlaðu skattskyldugu inntøkuni.

Líkningarráðið varð biðið um at gera metingar, hvat tílík skatting ávirkaði inntøkurnar hjá landskassanum og hjá kommununum. Teir komu fram til eitt tal sum 26 mió.kr. fyri árið 1984 alt annað líka.

Inntøkulógirnar, sum samtyktar vórðu á sumri 1989, hava máað figgjarliga støðið undan mangari familju og noytt uppaftur fleiri mammur út at arbeiða, sum heldur vildi virkað heima. Sjálvt um bæði hjúnini arbeiða úti, er tað trupult at fáa endarnar at røkka saman, og nógv klára tað ikki álíkavæl.

Tað gongur út yvir familjufelagsskapin og uppalingina, at arbeiðið heima við hús verður ikki mett, sum tað eigur at verða, og stuðlað. Løggávan tykist alt meir og meir at ganga ímóti hesum arbeiði.

Kønir menn telja nú tað ólønta arbeiðið, sum gjørt verður, upp í bruttotjóðarúrtøkuna við heilum 37,5% í grannalondum okkara. Tað man ikki vera minni her heima á landi. Talan er um arbeiðið, sum er inntøka fyri landið og hevur avgerandi týdning fyri trivna hjá hinum einstaka eins væl og tjóðini sum heild.

Tí verður hetta uppskot sett fram í samljóð við ST-samtyktina um mannarættindini, har tað í 16. grein, 3. petti, verður sagt: "Familjan er hin náttúrligi og grundleggjandi eindarbólkurin í samfelagnum og hevur tí krav upp á verju samfelagsins og ríksins."

Á FØROYA LØGTINGI, 19. december 1989

Niels Pauli Danielsen

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 47/1989: Um skatting av hjúnum við helvtarbýti.

Málið er framlagt av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki dann 19. december 1989 og eftir 1. viðgerð 24. januar 1990 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Jákup Lamhauge og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við málinum, tá landsstýrið arbeiðir við málinum, og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Vilhelm Johannesen og Tórbjørn Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Undir viðgerðini av málinum er komið fram, at samgongan sambært einum undirskjali til samgonguskjalið hevur sett sær fyri at seta í verk eina skipan, hareftir heimaarbeiðandi hjúnafelagin verður skattaður við helminginum av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum.

Minnilutin er sannførdur um, at við eini progressivari skattatalvu verður eitt býti av samlaðu inntøkuni millum hjúnafelagarnar vera til fyrimuns fyri hjúnini, serliga um hin heimaarbeiðandi lítla ella onga inntøku hevur. Tað hevði komið væl við hjá mongum, nú vit oman á skatt og hækkað avgjøld eisini hava tvungnu uppsparingina at dragast við.

Hin vegin gevur ein slík skipan teimum størstu inntøkunum størstan fyrimun.

Tað, sum kemur minni lun í skatti orsakað av helvtarbýtinum millum hjúnini, skulu onnur gjalda meir, eitt nú tey, sum bæði noydast at arbeiða úti fyri at kunna greiða skyldur sínar ella hin staki uppihaldarin.

Minnilutin kann ikki taka undir við uppskotinum, uttan so at hædd verður tikin fyri hesum skeivleikum, og setir tí einki uppskot fram.

SKATTANEVNDIN, 30. januar 1990.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heini O. Heinesen

Tórbjørn Poulsen Vilhelm Johannesen

FØROYA JAVNAÐARFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 48/1989: Um ikki at loyva hækkan av el-prísinum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum ikki at loyva SEV (el-felagnum) at seta í verk fráboðaðu hækkingina av elprísinum til varlig húsarhald.

Viðmerkingar:

Ein av grundgevingunum hjá SEV fyri at hækka prísin er, at nýtslan er nógv minkað og tí fær SEV minni inntøku.

Í hesum sambandi skal vísast á, at SEV í heyst hevur gjørt nógv burturúr at fáa fólk at spara streym (buggili-bug).

Brúkarin hevur í stóran mun fylgt hesi áheitan og sum tøkk fyri sparsemið, tær vanligi brúkarin nú eina hækking á el-prísinum við 7%.

Ein onnur grundgeving fyri at hækka prísin er útreiðslu-støðið hjá SEV. Her kann vísast á, at løgtingið í seinastu viku viðgjørdi eitt uppskot frá landsstýrinum um avtøku av eykainn-flutningsgjaldinum upp á 6%, sum førir við sær, tá talan er um oljunýtsluna hjá SEV, eina munandi sparing, umleið 3 mið. kr.

Sum ávist er nýtslan minkað, ein minni nýtsla førir við sær lægri framleiðslu og náttúrliga eisini færri rakstarút-reiðslur.

Á FØROYA LØGTINGI, 19. december 1989.

Henrik Old

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 48/1989: Um ikki at loyva hækkan av el-prísum.

Málið er framlagt av Føroya Javnaðarflokki tann 19. december 1990 og eftir 1. viðgerð 24. januar 1990 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Anfinn Kallsberg, Eilif Samuelsen, Flemming Mikkelsen, Jógvan Durhuus og Heini O. Heinesen) vísir á, at landsstýrið longu hevur givið SEV loyvi at hækka el-prísirnar við ávísum treytum, og setir meirilutin tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) tekur til eftirtektar, at landsstýrið longu hevur givið loyvi til, at elprísirnir hækkaðu, og harvið at húsarhaldsútreiðslurnar eru vaksnar.

Havandi bundnu uppsparingina og onnur tyngjandi tiltøk, landsstýrið hevur sett í verk, í huga, vil minnilutin gera vart við, at vanligi løntakarin orkar ikki, at fleiri byrðar verða lagdar á hansara herðar - hann hevur ivaleyst sum er!!

Hóast tað frá landsstýrisins síðu hevur ljóðað, at fleiri byrðar ikki tóru at verða lagdar á borgaran, so má ásannast, at so hevur ikki verið - tvørturímóti!

Tí verður sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum ikki at leggja fleiri byrð-

ar á vanliga løntakaran, men ístaðin at taka neyðug stig til at lætta um byrðarnar.

Ein annar minniluti (Jørgen Thomsen) tekur undir við uppskot Javnaðarfloksins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

FÍGGJARNEVNDIN, 28. mars 1990.

Anfinn Kallsberg | Eilif Samuelsen | Flemming Mikkelsen

Jógvan Durhuus | Heini O. Heinesen | Tordur Niclasen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

TIf. 11080 . Telex 81310 fingns fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

27. desember 1989

F. L. j. nr. 1198-2-72
Tað tiskila í svarinum

KjH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 49/1989: Skipan millum Føroyar og EF um sínamillum fiskirættindi í 1990.

U p p s k o t

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu skipan, dagfest 31. oktober 1989 um sínamillum fiskirættindi í 1990 millum Føroyar og EF.

Viðmerkingar:

1. Tann 31. oktober 1989 vóru samráðingar millum umboð fyri Føroya Landsstýri og EF-nevndina í Tórshavn um sínamillum fiskirættindi í 1990 millum Føroyar og EF. Úrslitið av samráðingunum er hjálagda skipan, undirritað í Tórshavn 31. oktober 1989.
2. Sáttmálin fyri 1990 javnvigar á sama støði í toskavirði, sammett við sáttmálan fyri 1989.
3. Loyvdu veiðunøgdirnar í 19ØØ av ósløgdum fiski eru hesar:

Hjá EEC-skipum á landleiðini:

Samlaða nøgdin av botnfiski, svartkjafti og makreli verður í 19ØØ (198Ø-nøgdin í klombrum):

500	tons	av	toski og hýsu (500 tons)
2.500	-	-	upsa (2.500 tons)
7.000	-	-	kongafiski (7.150 tons)
3.600	-	-	blálongu og longu (3.600 tons)
1.000	-	-	flatfiski (svartkalvi íroknaður) (1.000 tons)
760	-	-	ymiskum fiskasløgum (500 tons)
25.000	-	-	svartkjafti (25.000 tons)
4.370	-	-	makreli (4.270 tons)

Hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi:

(a) 800 tons tilsamans av longu, brosmu og blálongu á Rock All-leiðini. Loyvt er eisini at veiða 400 tons av ymiskum botnfiski sum hjáveiðu í iðnaðarfiskiskapi; í 1989 vóru nøgdirnar tær somu. Eisini er loyvt at veiða 940 tons av blálongu á havleiðunum vestanfyri Skotland (í 1989: 940 tons).

(b) 5.250 tons av tí vestara makrelstovninum. Í 1989 var loyvt at veiða tað sama. Roknað verður við, at Føroyar fáa loyvi at veiða 1.000 tons av kvótuni fyri 1990 eystan fyri 4°V vísandi til § 3, stk. 4 í váttaðu frásøgnini frá samráðingunum í Bruxelles.

(c) 7.000 tons av rossamakreli (í 1989 7.000 tons).

(d) 9.000 tons av hvítingsbróður, 9.000 tons av nebbasild og 2.000 tons av brislingi; 1989-tølini vóru tey somu. Fiskast kunnu tó eyka 10.000 tons av hvítingsbróður (íroknað hjáveiðu av svartkjafti, sum ikki slepst undan) og nebbasild, treytað av, at samlaða veiðunøgdin fyri hvítingsbróður (íroknað svartkjaft), nebbasild og brisling ikki fer upp um 20.000 tons (í 1989 20.000).

(e) 660 tons av sild vestan fyri Skotland (í 1989 660 tons).

(f) 62.000 tons av svartkjafti (1989 62.000 tons). Í veiðuni av svartkjafti er loyvt at hava hjáveiðu av gullaksi sum ikki slepst undan.

(g) 500 tons av sild í Skagerak; sama nøgd sum í 1989.

(h) 125 tons av hemara í øllum EEC-sjógvi. Tó ikki í NAFO 3 PS (St. Pierre og Miquelon) (í 1989 var nøgdin 150 tons).

Hjá føroyskum skipum í grønlendskum sjógvi (samb. § 1 (3) í fiskisáttmálanum millum EF og Grønland).

Í 1990 eru kvoturnar í grønlendskum sjógvi nakað broyttar sammett við árini undan, av tí at rækjukvota er flutt eystur um.

(i) 270 tons av rækjum í Vesturgrønlandi í NAFO-øki 1; (í 1989 475 tons). 880 tons av rækjum í Eysturgrønlandi í ICES-øki XIV (í 1989 675 tons).

(j) 150 tons av svartkalva undir Vesturgrønlandi og 150 tons undir Eysturgrønlandi. Í 1989 vóru nøgdirnar tær somu.

(k) Eisini verður loyvt at veiða 500 tons av kongafiski í ICES-øki XIV (Eysturgrønland) (í 1989 var nøgdin tann sama).

(l) Loyvt er í 1990 at veiða 10.000 tons av lodnu við Eysturgrønland (í 1989 sama nøgd).

Hesar kvotur eru tó treytaðar av, at sáttmálin millum Grønland og EF verður endaliga góðkendur.

Vísandi til § 3 í váttaðu frásøgnini er á sama hátt sum í 1989 grundarlagið undir semjuni um makrel, at ein heildarkvota verður avtalað millum Noreg, EF og Føroyar. Fer heildarkvotan upp, so skulu Føroyar eisini fáa størri part.

EF beyð Føroyum at meira rækja kundi verða flutt eysturum í 1990. Føroyar søgdu seg til reiðar at flyta meira enn tey 205 tonsini, sum longu eru avtalað at flyta, um EF biður um tað.

Reglurnar fyri fiskiskapi eru óbroyttar í 1990 bæði hjá Føroyum og EF við einum undantaki.

Í stk. 4 í váttaðu frásøgnini frá samráðingunum í 1988 um fiskiskap millum EF og Føroyar, sum løgtingið góðkendi í februar 1989, fekk EF eitt lyfti um, at føroyskir myndugleikar fóru at viðgera eitt uppskot frá EF um, hvussu kvotan hjá EF-skipum av toski og hýsu undir Føroyum betri kundi veiðast.

Henda kvota er 500 tons av toski og hýsu í 1990. Í stk. 2.1.1.1 í frásøgnini um reglur fyri fiskiskapi í 1990 er sett ein nýggj skipan upp fyri veiðu av hesum 500 tonsum. 8 skip fáa serloyvi til hesa veiðu (roknað verður við at tey verða bretsk), 4 kunnu vera í senn undir Føroyum. Hesi skip sleppa at veiða hesa avmarkaðu nøgd við 135 mm meskum á økinum sunnan fyri 62°28'N og eystan fyri 6°30'W.

"Fyri hvørt barnið, sum ikki er 16 ár í byrjanini av tí álmanakkaári, sum skattur er ásettur, verða í útroknaða landsskattinum sambært § 1 í hesari lóg, hjá teimum skattskyldugu eftir § 1 nr. 1-6 í samtíðarskattalógini, drignar kr. 2.200,00 frá sbr. § 46, 3. stk. í somu lóg.	"For hvert barn, som i begyndelsen af det kalenderår, for hvilket skatten udskrives, er under 16 år, gives der i den beregnede landsskat, jvf. § 1 i denne lov de i kildeskattelovens § 1, nr. 1-6 nævnte skattepligtige personer et fradrag på kr. 2.200,00 jvf. § 46,

Stk. 2. Í hjúnalag verður frádrátturin í skattinum hjá manninum. Um hesin ikki fær nýtt frádráttin til fulnar, skal restin verða drigin frá í skattinum hjá móðurini, um hon er sett í skatt sambært § 4, 2. stk. í samtíðarskattalógini.

Stk. 3. Við barn meinast hjúnabandsbarn, barn uttan húnaband, tá ið móðirin er skattgjaldarin, stjúkbarn, ættleitt barn ella fosturbarn, sum ikki er latið støðugt fosturviðurlag fyri.

Stk. 4. Er barnafrádrátturin hægri enn skatturin uttan barnafrádrátt verður munurin útgoldin avvarðandi skattgjaldara. Føroya Gjaldstova rindar peningin í oktober mánaði."

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1990.

Stk. 2. Fyri 1990 verður frádrátturin sambært § 1 tó 1.100 kr.

stk. 3 i kildeskatteloven.

Stk. 2. Ægtemanden oppebærer fradraget. Hvis denne ikke kan udnytte fradraget fuldt ud, bliver resten at fradrage hos moderen, hvis denne er ansat til skat ifølge § 4, stk. 2 i kildeskatteloven.

Stk. 3. Ved barn forstås ægtebarn, barn uden for ægteskab, når moderen er skattepligtig, stedbarn, adoptivbarn eller plejebarn, for hvis pleje, der ikke ydes vedvarende vederlag.

Stk. 4. Er børnefradraget større end skatten uden børnefradrag, udbetales differencen til den pågældende skatteborger. Føroya Gjaldstova udbetaler beløbet i oktober måned."

§ 2. Denne lov træder i kraft 1. juli 1990.

Stk. 2. For 1990 udgør fradraget i henhold til § 1 dog 1.100 kr.

Viðmerkingar:

Lógaruppskotið um barnafrádrátt verður lagt fyri tingið samstundis sum uppskot til lóg um barnastyrk, í staðin fyri lóg nr. 50 frá 5. mai 1987 við seinni broytingum.

Hetta broytingaruppskotið ber í sær, at barnastyrkurin í stóran mun fellur burtur, men samstundis kemur barnafrádrátturin í landsskattinum í gildi aftur.

Orðingin í § 2 er annars tann sama sum varð galdandi áðrenn 1. januar 1988, tá tann táverandi § 2 varð strikað við § 1 í løgtingslóg nr. 27 frá 30 apríl 1987 í samband við lógina um barnastyrk.

Barnafrádrátturin er tann sami fyri hvørt barnið, sum ikki er 16 ár í byrjanini av tí kalendarári, sum skattur verður útskrivaður, og barnafrádrátturin er ikki ávirkaður av inntøku foreldranna.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/

Jalgrím Hildiberg

Á l i t

í

<u>løgtingsmáli nr. 54/1989: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.</u>

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 29. december 1989 og eftir 1. viðgerð 29. december beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Jákup Lamhauge og Heini O. Heinesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

Minnilutin (Atli P. Dam og Tórbjørn Poulsen) førir fram:

Tað var kanska ikki so løgið, at eingin samgongutinglimur tók orðið til viðmæli av uppskotinum at lækka barnastyrkin og taka uppaftur skipanina við ávísum skattafrádrátti, tí undir nevndarviðgerðini er komið fram, at samtykta uppskoti landsstýrisins sum mest er "proforma", tí landsstýrið ætlar nevniliga at koma við broyting seinni, sum greitt ásetir, at skattafrádrátturin undir øllum umstøðum skal kunna flytast í millum hjúnafelagar, so mamman eisini "eigur í".

Tíð verður at fremja slíka broyting, upplýsir meirilutin, tí brúk er ikki fyri lógini fyrr enn seinru helvt av 1990.

Tá hon kortini skal verða samtykt nú, má hetta sostatt hava politiskar og ikki sakligar grundir, eitt nú at onkur hevur brúk fyri knappholsblómu at gera sær dælt við fyri tjóðveldisfloksins rokning.

Onnur verunlig orsøk kann liggja í tí, sum framsøgumaður KFFF's nevndi "myrkursins gerning", og sæð út frá teim fráboðanum um tiltøk, sum fakfeløgini hava sett fram, skilir ein, at ætlanin er at taka hesi á bóli við at hurla uppskotini ígjøgnum á óforsvarligan hátt.

Minnilutin mótmælir teim arbeiðskorum, samgongan veitir løgtinginum og heldur seg ikki fáa umstøður at geva uppskotinum sakliga og álvarsliga (seriøsa) viðgerð og setir tí einki uppskot fram, men vil, tá landsstýrissamgongan kemur við ætlaðu broytingini, skjóta upp, at upphæddin, ið dragast skal frá ásetta skattinum, verður 3.000 kr. í staðin fyri 2.200 kr.

SKATTANEVNDIN, 29. december 1989.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 29. december 1989

Tlf. 11088. Telex 81310 tingm fo. Telefax 14942. Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. leygardag stongt

NF/or

F. L. j. nr. (at tilskrifa í svari) 1010-31-1

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 55/1989: Løgtingslóg um barnastyrk.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um barnastyrk.

§ 1. Barnastyrkur verður goldin fyri børn 6 ár og yngri, smb. § 6.

§ 2. Barnastyrkurin er 1.500 kr. fyri hálvárið. Um barnið er í vøggustovu, barnagarði, almennari dagrøkt ella øðrum almennum barnaansingarstovni hálvan dag, er barnastyrkurin 750 kr. fyri hálvárið.

§ 3. Tað er ein treyt fyri útgjalding av barnastyrki, at barnið hevur heimstað í Føroyum og er tilmeldað fólkayvirlitinum.

lagtingslov om børnetilskud.

§ 1. Børnetilskud udbetales for børn på 6 år og derunder, jvf. § 6.

§ 2. Børnetilskudet udgør 1.500 kr. for hvert halvår. Såfremt barnet den halve dag er i vuggestue, børnehave, offentlig dagpleje eller anden offentlig børnepasningsinstitution, udgør børnetilskudet 750 kr. for hvert halvår.

§ 3. Det er en betingelse for udbetaling af børnetilskud, at barnet har hjemsted på Færøerne og er tilmeldt folkeregisteret.

§ 4. Barnastyrkurin verður ikki útgoldin, um barnið er á barnaheimi ella í fosturheimi, sum tað almenna rindar fyri, ella um tað almenna annars forsyrgir barninum.
Stk. 2. Barnastyrkurin verður heldur ikki útgoldin, um barnið er allan dagin í vøggustovu, barnagarði, almennari dagrøkt ella øðrum almennum barnaansingarstovni.

§ 4. Børnetilskud udbetales ikke, hvis barnet er på børnehjem eller i plejehjem, som det offentlige betaler for, eller hvis det offentlige iøvrigt forsørger barnet.
Stk. 2. Børnetilskud udbetales heller ikke, såfremt barnet er heldags i vuggestue, børnehave, offentlig dagpleje eller anden offentlig børnepasningsinstitution.

§ 5. Barnastyrkurin verður goldin mammuni at barninum, um barnið býr hjá henni. Um barnið ikki býr hjá mammuni, verður barnastyrkurin goldin tí, sum barnið býr hjá. Almannastovan tekur avgerð í ivamálum og kann í serligum førum gera av, at barnastyrkurin verður útgoldin á annan hátt.

§ 5. Børnetilskud udbetales til barnets mor, hvis barnet bor hos hende. Hvis barnet ikke bor hos moderen, udbetales børnetilskudet til den, som barnet bor hos. Almannastovan træffer afgørelse i tvivlsspørgsmål og kan i særlige tilfælde bestemme, at børnetilskudet skal udbetales på anden måde.

§ 6. Um tann, ið hevur rætt til barnastyrk, ikki vil taka ímóti honum, verður barnastyrkurin ikki útgoldin.
Stk. 2. Barnastyrkur verður ikki útgoldin, tá meira enn eitt ár er frálíðið síðan hann kundi koma til gjaldingar sambært § 7.
Stk. 3. Ov nógv útgoldin barnastyrkur kann mótroknast í seinni útgjaldingum ella

§ 6. Såfremt den, der er berettiget til børnetilskud, ikke ønsker at modtage dette, udbetales børnetilskudet ikke.
Stk. 2. Børnetilskud udbetales ikke, når der er forløbet et år efter den tid, da det i henhold til § 7 kunne udbetales.
Stk. 3. For meget udbetalt børnetilskud kan modregnes i

krevjast afturgoldin.

§ 7. Barnastyrkurin verður uttan umsókn útgoldin frammanundan 2 ferðir um árið, í februar mánað fyri tíðarskeiðið 1. januar til 30. juni og í august mánaða fyri tíðarskeiðið 1. juli til 31. desember.

Stk. 2. Barnastyrkurin verður útgoldin av tí kommununi, har barnið er tilmeldað fólkayvirlitinum 1. januar ávikavist 1. juli.

Stk. 3. Treytirnar í §§ 3, 4 og 5 skulu vera loknar viðkomandi 1. januar ella 1. juli. Føðing, flyting og broyting annars í teimum viðurskiftum, sum nevnd eru í §§ 3, 4 og 5, hava einans ávirkan á komandi útgjalding.

§ 8. Viðkomandi býráð ella bygda(r)ráð rindar út barnastyrkin og tekur støðu til onnur ivamál enn tey, sum nevnd eru í § 5.

Stk. 2. Avgerðir hjá býráði ella bygda(r)ráði kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri Líkningarráð Føroya.

Stk. 3. Avgerðir hjá Líkningarráð Føroya ella sambært § 5 hjá Almannastovuni kunnu innan 4 vikur skjótast inn

senere udbetalinger eller kræves tilbagebetalt.

§ 7. Børnetilskud udbetales uden ansøgning forud 2 gange årligt, i februar måned for perioden fra 1. januar til 30. juni og i august måned for perioden fra 1. juli til 31. desember.

Stk. 2. Børnetilskud udbetales af den kommune, hvor barnet er tilmeldt folkeregisteret 1. januar henholdsvis 1. juli.

Stk. 3. Betingelserne i §§ 3, 4 og 5 skal være opfyldt vedkommende 1. januar eller 1. juli. Fødsel, flytning eller andre ændringer i de i §§ 3, 4 og 5 omtalte forhold, har alene betydning for førstkommende udbetaling.

§ 8. Vedkommende byråd eller bygderåd udbetaler børnetilskudet og tager stilling til andre tvivlsspørgsmål end de i § 5 omtalte.

Stk. 2. Byrådets eller bygderådets afgørelse kan inden 4 uger indbringes for Líkningarráð Føroya.

Stk. 3. Afgørelser, som er truffet af Líkningarráð Føroya eller i medfør af § 5 af Almannastovan kan inden 4

fyri Føroya Landsstýri.

Stk. 4. Innan 1. apríl og 1. oktober sendir býráðið ella bygda(r)ráðið Líkningarráði Føroya sundurgreinaða uppgerð yvir útgoldnan barnastyrk. Líkningarráð Føroya kannar uppgerðina.

Stk. 5. Innan 1. mai og 1. november gevur Líkningarráð Føroya Føroya Gjaldstovu boð um at gjalda ella góðskriva viðkomandi kommununum útgoldnan barnastyrk samhært uppgerðini við teimum rættingum, sum Líkningarráð Føroya møguliga hevur gjørt.

uger indbringes for Færøernes Landsstyre.

Stk. 4. Inden 1. april og 1. oktober indsender byrådet eller bygderådet til Likningarråd Føroya en specificeret opgørelse over udbetalte børnetilskud. Likningarråd Føroya kontrollerer opgørelsen.

Stk. 5. Inden 1. mai og 1. november giver Líkningarráð Føroya meddelelse til Føroya Gjaldstova om at udbetale eller godskrive vedkommende kommune udbetalt børnetilskud i henhold til opgørelsen med de ændringer, som Líkningarráð Føroya eventuelt har foretaget.

§ 9. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 1990. Løgtingslóg nr. 50 frá 5. mai 1987, løgtingslóg nr. 104 frá 17. desember 1987 og løgtingslóg nr. 72 frá 9. juni 1988 fara úr gildi tann 31. mars 1990.

§ 9. Denne lagtingslov træder i kraft 1. juli 1990. Lagtingslov nr. 50 af 5. mai 1987, lagtingslov nr. 104 af 17. december 1987 og lagtingslov nr. 72 af 9. juni 1988 ophæves den 31. marts 1990.

Viðmerkingar:

Í samgongugkjalinum hjá núverandi samgonguflokkum stendur: "Skipanin um barnastyrk verður endurskoðað og broytt soleiðis, at hon bert fevnir um børn undir skúlaaldur, sum ikki koma undir almennu barnaansingarskipanina."

Barnastyrkurin hevur fyri 1989 kostað landskassanum umleið 74 mió. kr. Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1990 eru avsettar 40 mió. kr. til barnastyrk.

Fyrilyggjandi uppskot um nýgja lóg um barnastyrk sum kemur í staðin fyri lógina frá 5. mai 1987 við seinni broytingum, er gjørd út frá eini játtan uppá 40 mió. kr. og er annars í samsvar við samgonguskjalið. Harumframt verður framlagt lógaruppskot í løgtingsmáli nr. 54/1989, um ein barnastyrk uppá 2.200 kr. árliga til øll børn upp til 16 ár (frá 0 til 15 ár íroknað), og verður hesin styrkur frádrigin í skattinum hjá øðrum av foreldrunum. Tað vil siga, at í hesum føri verður farið aftur til skipanina áðrenn 1987. Samanlagt kosta hesi bæði uppskotini landskassanum 40 mió. kr.

Fyri barnastyrkin, sum frádrigin verður í skattinum, geldur, at hann er til børn, sum ikki eru fylt 16 ár hin 1. januar í skattaárinum.

Fyri styrkin til børnini undir 7 ár verður hann goldin, um tey ikki eru fylt 7 ár ávikavist hin 1. januar ella 1. juli í viðkomandi ári. Tað vil siga, at í hesum føri verður gjørt upp hálvársvís. Sama er galdandi fyri avgerðina um barnið er undir almennari barnaansing ella ikki.

Kommunurnar skulu skipa fyri útgjaldingini av hesum barnastyrkinum.

Viðmerkjast skal eisini, at landsstýrið hevur sett arbeiðsbólk at skipa fyri kommunalari yvirtøku av barnaansingini við heildarveiting frá landskassanum.

Kostnaðurin av samlaða barnastyrkinum kann gerast upp soleiðis:

5420 børn undir 7 ár harav uml. 4000 ikki á stovni 4000 x 3000	12,0 mió. kr.
12430 børn undir 16 ár ár 2.200	27,4 mió. kr.
	39,4 mió. kr.

Fyri árið 1990 verður tó galdandi, at barnastyrkurin verður útgoldin fyri januar ársfjórðing 1990 eftir teimum reglum, sum hava verið galdandi, og at barnastyrkurin eftir teimum nýggju reglunum verður útgoldin frá 1. juli 1990. Barnafrádrátturin í skattinum verður galdandi frá 1. juli 1990 og verður fyri 1990 ásettur til 1.100 kr.

Vísandi til frammanfyri standandi kann kostnaðurin fyri 1990 gerast soleiðis upp:

januar ársfj.	(74mió.kr.:4)	18,5 mió. kr.
seinna hálvár	(12,0 mió. kr.:2)	6,0 mió. kr.
skattafrádráttur	12430 børn á 1.100 kr.	13,7 mió. kr.
	Tilsamans	38,2 mió. kr.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/

Klaus Hermann

Á l í t

í

Løgtingsmáli nr. 55/1989: Løgtingslóg um barnastyrk.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 29. december 1989 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í **ein** meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Petur Reinert, Flemming Mikkelsen og Jógvan á Lakjuni) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men setir kortini fram hetta

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Sum nýggj § 9 verður sett:
"§ 9. Barnastyrkur ávirkar ikki veitingar til børn eftir lóggávuni annars."
2) Sum nýggj § 10 verður sett:
"§ 10. Barnastyrkur er skattafrír."
3) § 9 í landsstýrisins uppskoti verður § 11.

1) Som ny § 9 indsættes:
"§ 9. Børnetilskud påvirker ikke ydelser til børn efter anden lovgivning."
2) Som ny § 10 indsættes:
"§ 10. Børnetilskud er skattefrit."
3) § 9 i landsstyrets forslag bliver § 11.

Ein minniluti (Niels Pauli Danielsen) tekur ikki undir við landsstýrisins uppskoti og setur í staðin fyri alt landsstýrisins uppskot verður í galdandi løgtingslóg um barnastyrk

sett fram soljóðandi

U p p s k o t

§ 1. Í løgtingslóg nr. 50 frá 5. mai 1987 um barnastyrk við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3, 1. stk. verður orðað soljóðandi:
"Fullur barnastyrkur verður goldin, um inntøkugrundarlagið er
1) hjá støkum 165.000 kr. ella minni og
2) hjá hjúnum 351.000 kr. ella minni.
Um inntøkugrundarlagið er hægri enn ávikavist 165.000 kr. og 351.000 kr., verður barnastyrkurin lækkaður við 1% fyri hvørt byrjað tal av 1.000 kr., sum inntøkugrundarlagið er hægri enn 165.000 kr. ávikavist 351.000 kr."

2) § 3, 3. stk. verður orðað soljóðandi:
"Inntøkugrundarlagið er skattskyldúga inntøkan. Skattskyldúga inntøkan verður roknað eftir somu reglum sum fyribilsskattaskráseting sbrt. §§ 67-76 í løgtingslóg nr. 86 frá 9. september

§ 1. I lagtingslov nr. 50 af 5. maj 1987 om børnetilskud med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 3, 1. stk. affattes således:
"Fuldt børnetilskud udbetales, såfremt indtægtsgrundlaget er:
1) for enlige 165.000 kr. eller mindre og
2) for ægtepar 351.000 kr. eller mindre.
Såfremt indtægtsgrundlaget overstiger henholdsvis 165.000 kr. og 351.000 kr., nedsættes børnetilskuddet med 1% for hver påbegyndte 1.000 kr., som indtægtsgrundlaget overstiger henholdsvis 165.000 kr. og 351.000 kr."

2) § 3, stk. 3, affattes således:
"Indtægtsgrundlaget er den skattepligtige indtægt. Den skattepligtige indtægt beregnes efter samme regler som forskudsregistreringen efter reglerne i §§ 67-76 i lagtingslov nr.

1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum."

3) Í § 3 verður sett sum nýtt 4.
"Líkningarráð Føroya javnar inntøkugrundarlagið 4 ferðir um árið við byrjan av einum ársfjórðingi."

4) Í § 3 verður sett sum nýtt 5. stk.:
"Um útgjaldingin er ov lág orsakað av skeivt roknaðum inntøkugrundarlagi kann tann, ið fær barnastyrkin útgoldnan, eftir umbøn hjá Líkningarráð Føroya fáa íreststandi ummhæddina útgoldna beinan vegin. Í endaligu skattaálíkningini verður barnastyrkurin javnaður eftir somu reglum sum endaligi skatturin. Møguliga ov nógv útgoldin barnastyrkur verður innkravdur eftir somu reglum sum íreststandi skattur."

5) §§ 4-15 verða hereftir §§ 5-16.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1990.

80 af 1. septemnber 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer."

3) I § 3 indsættes som nyt stk. 4.:
"Líkningarráð Føroya regulerer indtægtsgrundlaget 4 gange årligt, i begyndelsen af et kvartal."

4) I § 3 indsættes som nyt stk. 5.:
"Såfremt der udbetales for lidt på grund af forkert beregnet indtægtsgrundlag, kan den, der får udbetalt børnetilskuddet efter anmodning hos Líkningarráð Føroya få udbetalt det resterende beløb. Børnetilskud bliver at regulere i den endelige skattepåligning efter samme regler som slutskatten. Eventuelt for meget udbetalt børnetilskud indkræves efter samme regler som restskat."

5) §§ 4-15 verða hereftir §§ 5-16.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1990.

Nevnda broyting inntøkujavnar barnastyrkin og er í samsvar við fyrsta lógaruppskotið og broytingaruppskotið frá 17. november 1987.

Uppskotið førir eina sparing við sær upp á o.u. 18 mió. kr.

Samtíðis vísir minnilutin á, at møguleikar eiga at vera fyri alternativari barnaansing, og loyvir minnilutin sær tí at seta fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot um, at tey 40%, ið landskassin rindar fyri børn á ansingarstovni, í staðin verða latin foreldrunum í hækkaðum barnastyrki.

Ein annar minniluti (Jákup Lindenskov) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, sum mest rakar lág- og meðalinntøkurnar, t.v.s. inntøkur, har neyðugt er, at bæði maður og kona eru úti og arbeiða fyri at klára dagligu krøvini.

Serliga nervar uppskot landsstýrisins einsamallar forsyrgjarar, sum noyðast at lata børnini ansa úti.

Javnaðarflokkurin hevur fleiri ferðir víst á høpisloysi í, at eisini verður latin barnastyrkur til fólk við heilt stórum inntøkum.

Upprunauppskot gamla landsstýrisins var, at barnastyrkurin skuldi verða inntøkujavnaður.

Hetta fall á tingi.

Minnilutin - Javnaðarflokkurin - mælir tí til at seta í gildi upprunaliga uppskotið - og setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at javnføra reglurnar um inntøkujavning og at leggja fyri løgtingið uppskot um at seta § 3 í upprunalógini aftur í gildi.

Um ætlan samgongunnar kortini er at kroysta uppskotið ígjøgnum í kvøld so óforsvarlig, sum viðgerðin hevur verið, loyvir minnilutin sær at vísa á, hvussu hart tey verða rakt, ið mugu hava børn sín ansað av øðrum, og setir ti í aðru syftu fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í staðin fyri § 2 í uppskoti landsstýrisins verður sett sum nýggj:
"§ 2. Barnastyrkurin er kr. 2.200,- fyri hálvárið.
Stk. 2. Børn hjá støkum uppihaldara fáa kr. 2.800,-."

I Stedet for § 2 i landsstyrets forslag indsættes som ny:
"§ 2. Børnetilskudet er kr. 2.200 pr. halvår.
Stk. 2. Enlige forsørgeres børn får kr. 2.800,-."

ALMANNA- OG HEILSUNEVNDIN, 29. december 1989.

Petur Reinert Flemming Mikkelsen Jógvan á Lakjuni

Niels Pauli Danielsen Jákup Lindenskov

Tórbjørn Poulsen
Niels Pauli Danielsen
Jørgen Thomsen
løgtingsmenn

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 56/1989: Neyðhjálp til Rumenia.

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at veita neyðhjálp til Rumenia við upp til kr. 1.000.000 úr grunninum til menningarhjálp, soleiðis at helvtin verður veitt gjøgnum Reyða Kross og helvtin gjøgnum Neyðhjálp Fólkakirkjunnar.

Viðmerkingar:

Eisini vit fegnast um, at fólkaræðið loksins aftur hevur fingið fótafesti í Rumenia. At einaræðið er fallið, og fólkið hevur vunnið frælsið.

Hin vegin harmast vit um tey mongu mannalív, sum hetta stríð hevur kostað, og ta neyð, sum í hesum døgum valdar í landinum.

Til tess at vera við í teirri hjálp, sum mangastaðni frá verður veitt Rumenia, verður mælt til at veita stuðul úr grunninum til menningarhjálp, og at henda hjálp verður veitt beinanvegin.

Samsvarandi Føroya gjaldstovu er grunnurin soleiðis fyri:

Í grunninum 1.1.1989		kr. 7.500.000,-
Veitt higartil í ár	kr. 342.841,-	
Játtan í 1989	kr. 5.000.000,-	kr. 4.657.159,-
Sostatt eftir pr. 29.12.89		kr. 12.157.159,-

Mælt verður til, at hjálpin verður veitt gjøgnum Reyða Kross og Neyðhjálp Fólkakirkjunnar.

Á FØROYA LØGTINGI, 29. december 1989.

Tórbjørn Poulsen Niels Pauli Danielsen Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

TF. 11080 . Telex 81310 fisgm fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15. leygardag stongt

NáV/or

19. januar 1989

F. L. j. nr. (at tilskila í svari) 1010-17-2

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 57/1989: Søla av einum parti av fastogn landsstýrisins í Vági.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um sølu av einum parti av fastogn landsstýrisins í Vági.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at selja matr. nr. 422b og 422c í Vági.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om salg af en del af landsstyrets faste ejendom i Vági.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at sælge matr. nr. 422b og 422c i Vági.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Í sambandi við, at landsstýrið hevur sett í verk eina skráseting av landsins føstu ognum og eisini eina kanning av, í hvørjum standi ognirnar eru, hevur landsstýrið samtykt at biðja løgtingið um heimild til at selja tvey sethús, sum landsstýrið eigur í Vági.

Tað eru ognirnar matr. nr. 422b og 422c, sum fyrr hoyrdu til

loranstøðina. Húsini, sum eru bygd umleið 1948, eru ikki í góðum standi, og treingja til stórar umvælingar.

Um húsini verða umvæld og kostnaðurin verður avskrivaður yvir t.d. 10 ár, so verða mánaðarligu útreiðslurnar nógv størri enn tað, sum húsini kunnu leigast út fyri.

Eisini haldur landsstýrið, at tað er eingin orsøk til, at tað almenna skal eiga sethús ymsa staðni í landinum, tá so er, at tað almenna sjálvt ikki hevur brúk fyri húsunum.

Eg kann eisini nevna, at landsstýrið í framtíðini ætlar sær at selja aðrar ognir eisini, bæði á bygd og í bý.

Hetta verður gjørt fyri at sleppa undan útreiðslum til viðlíkahald og tryggingar o.a.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/

Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

<u>løgtingsmáli nr. 57/1989: Søla av einum parti av fastogn landsstýrisins í Vági.</u>

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 24. januar 1990 og eftir 1. viðgerð 31. januar beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Anfinn Kallsberg, Eilif Samuelsen, Flemming Mikkelsen og Jørgen Thomsen) mælir løgtinginum til at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein minnilutin (Jógvan Durhuus og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men vísir á, at ognirnar, sum ætlanin nú er at selja, vóru keyptar í 1980 við heimild í løgtingslóg um lántøku kr. 1.256.000,oo til eitt samlað keyp av Loranstøðini í Vági.

Í viðmerkinginum til lógaruppskotið varð m.a. sagt, at Statens Åndsvageforsorg og Almannastovan høvdu kannað bygningarnar, og at landsstýrið út frá hesum úrsliti var komið til ta niðurstøðu, at bygningarnir fyri ein stóran part vóru væl hóskandi til almanna endamál.

Vísandi til, at ein lutfalsliga kostnaðarlítil umbygging til vardan verkstað er framd yviri á Bakka og tikin í nýtslu í fjør, er skjøtil endiliga settur á at loysa hetta átrokandi mál í Suðuroy. Nú gongd er komin á málið, og tørvur er á fleiri fermetrum, mælir meirilutin ikki til, at húsini verða seld, men at tey heldur verða sett í stand, og at játtan til endamálið verður útvegað á komandi fíggjarlóg.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) er av teirri áskoðan, at fær landsstýrið neyðuga heimild at selja umtalaðu ogn, eigur søla til eitt hvørt sosialt/vælgerandi endamál at liggja fremst, og verður tí sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum, at søla av matr. 422b og 422c í Vági verður fyrst og fremst at fremja til sosialt/vælgerandi endamál.

FÍGGJARNEVNDIN, 26. apríl 1990.

Anfinn Kallsberg Flemming Mikkelsen Jógvan Durhuus

Eilif Samuelsen Heine C. Heinesen Tordur Niclasen

Jørgen Thomsen

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

løgtingsmál nr. 57/1989: Søla av einum parti av fastogn landsstýrisins í Vági.

Við 2. viðgerð tann 4. mai fall uppskotið til samtyktar um at seija matr. nr. 422b og 422c í Vági fyrst og fremst til sosialt vælgerandi endamál.

Vísandi til 1. viðgerð av málinum uppskotið til samtyktar, sum fall, loyvir minnilutin (Jógvan Durhuus og Heini O. Heinesen) sær at seta soljóðandi broytingaruppskot fram við 3. viðgerð.

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum ikki at selja matr. nr. 422b ella 422c til støk fólk við skattskyldugari inntøku yvir 150.000 kr. ella hjún við skattskyldugari inntøku yvir 200.000 kr.

Á FØROYA LØGTINGI, 8. mai 1990.

Jógvan Durhuus

Heini O. Heinesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

Tlf. 11000 . Telex 81310 tingux fa . Telefax 14941 . Pósthox 64
Avgreiðsluriði: Kl. 10—15, laygardag stongt

19. januar 1989

F. L. j. nr. (at tilskila í svari) 1408-5-2

JøH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 58/1989: Ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1990 at borga sum einfaldur borgsmaður fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild, úrdráttir av svartkjafti og agn á goymslu. Eisini verða møguleikar fyri at borga vanligt fyri goymslulánum, bæði fyri rávørur og lidna framleiðslu, til niðursjóðingarvirki og til fiskaroykivirki í Føroyum. Borgan verður givin fyri lánum ikki upp um 70% av lánsvirðinum.

lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1989 at kautionere med simpel kaution for lån til fiskemel, animalsk olie, konsumsild, produkter af blåhvilling og agn på lager. Også bliver det muligt at garantere simpelt for lagerlån, både for råvarer og for færdigproduktion, til konserveringsvirksomheder og til fiskerygningsvirksomheder på Færøerne. Kautionen ydes for lån, der ikke må overstige 70% af lånsværdien.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 27 frá 20. apríl 1989, sum fór úr gildi 31. desember 1989, sí løgtingsmál nr. 69/1988. Tó eru alifóðurvirkir og tøtingarvirkir ikki við í uppskotinum.

Víst verður til viðmerkingar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 54/1975, Løgtingstíðindi 1975, bls. 231.

Higartil í fíggjarárinum 1989 eru borganir veittar fyri 35,5 mió. kr.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/

Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 58/1989: Ábyrgd fyri lánum til fiskamøl og lýsi v.m. á goymslu.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 24. januar 1990 og eftir 1. viðgerð 31. januar beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið upplýsir í viðmerkingunum, at uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 27 frá 20. apríl 1989, sum fór úr gildi 31. dec. 1989.

Ein broyting í mun til undanfarnu veðhaldslóg er tó, at nú eru alifóðurvirki og tøtingarvirki ikki við í uppskotinum.

Hesi virki vóru við í lógini eftir uppskoti frá fíggjarnevndini. Upp á fyrispurning hevur landsstýrið upplýst, at veðhaldið eftir hesi lóg seinastu tríggjar árini er fyri tilsamans 65,9 mió. kr., harav eru 25,5 mió. kr. falnar til gjaldingar.

Eisini er vandi fyri, at annað veðhald upp á 3,5 mió. kr. fyri agn á goymslu verður effektivt.

Fyri at avmarka, at lán gerast effektiv, áleggur fíggjarnevndin landsstýrinum og fiskivinnuumsitingini at ansa væl eftir, at galdandi fyriskipanir, sum til dømis reglurnar um agnstudning verða umsitnar á ein slíkan hátt, at sleppast kann undan, at givin veðhald eftir hesi lóg gerast effektiv.

Ein meiriluti (Anfinn Kallsberg, Flemming Mikkelsen, Jógvan Durhuus, Eilif Samuelsen og Heini O. Heinesen) mælir út frá hesum løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Tordur Niclasen og Jørgen Thomsen) tekur undir við tí, sum omanfyri er tilskilað, men er av teirri áskoðan, at alifóðurvirki og tøtingavirki ikki eiga at verða tikin úr lógini, og setir nevndi minniluti fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður aftaná orðið: niðursjóðingarvirki sett inn: "alifóðurvirki, tøtingarvirki"

I § 1 indsættes efter konservesvirksomheder: "fabrikker, der producerer foderstoffer til fiskeopdræt, fabrikker, der tilvirker uldtøj."

FÍGGJARNEVNDIN, 21. mai 1990.

Anfinn Kallsberg Flemming Mikkelsen Heine O. Heinesen

Eilif Samuelsen Jørgen Thomsen Jógvan Durhuus

Tordur Niclasen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11000 . Telex 81310 tinges fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Argreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

19. januar 1990

F. L. j. nr. (at tiskfla i svari) 1427-2

JøH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 59/1989: Veðhald fyri lánum til smærri iðnaðarvirkir.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til smærri iðnaðarvirkir.	lagtingslov om garanti for lån til mindre industrivirksomheder.
§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1990 og 1991 at veita veðhald fyri lánum upp til 3,0 mió. kr. hvørt fíggjarárið til smærri iðnaðarvirkir.	**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansårene 1990 og 1991 at yde kaution for lån indtil 3,0 mio. kr. hvert finansår til mindre industrivirksomheder.
§ 2. Hesi lán verða at nýta til stovnan av nýggjum virkjum, víðkan og nútímansgerð av gomlum o.t. **Stk. 2.** Veðhald skal altíð verða ásett við eini mestu upphædd. **Stk. 3.** Lánini mugu ikki fara upp um 70% av tí virði, sum nýggju íløgurnar hava eftir	**§ 2.** Disse lån skal anvendes til reetablering af virksomheder, udvidelse af gamle o.l. **Stk. 2.** Kautionen skal altid være fastsat med et maximumsbeløb. **Stk. 3.** Lånene må ikke overstige 70% av den værdi, som de nye investeringer har i

meting.

stk. 4. Lánini skulu verða tryggjað við panti í fastogn ella leysafæ innanfyri 70% av tí virði, fastognin ella leysafæið eru mett til. Leysafæ kann tó bert nýtast sum pant um metingarvirðið er ikki minni enn 150.000 kr.

§ 3. Kemur landskassin sum veðhaldari at rinda pening, og sostatt fær krav móti skuldaranum, verður kravið at renta við rentu, landsstýrið ásetir, frá tí degi, landskassin hevur lagt pening út.

§ 4. Um lán ikki er veitt eitt ár eftir, at landsstýrið hevur givið tilsøgn um veðhald, fellur tilsøgnin burtur.

§ 5. Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

hendld til vurdering.

stk. 4. Lånene skal være sikrede ved pant i løsøre inden for 70% af den værdi, som den faste ejendom eller løsøret er vurderet til. Løsøre kan dog kun anvendes som pant for så vidt vurderingssummen er ikke mindre end 150.000 kr.

§ 3. Såfremt landskassen sum kautionist kommer til at betale penge, og på denne måde får krav imod skyldneren, forrentes dette krav med en rente, som landsstyret fastsætter, fra den dag, landskassen har udlagt beløbet.

§ 4. Såfremt lån ikke er effektueret et år efter, at landsstyret har givet tilsagn om kaution, bortfalder tilsagnet.

§ 5. Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur hvørt ella annaðhvørt ár síðani 1960 fingið heimild við løgtingslóg at veðhalda fyri lánum til smærri idnaðarvirkir. 1. januar 1990 gekk núverandi heimild út, sum er

ásett við løgtingslóg nr. 3 frá 15. juni 1988, jbr. løgtingsmál nr. 21/1987.

Í 1988 og 1989 eru veitt veðhald uppá tilsamans 1.060.000 kr.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/ Kjartan Huydal

Á l i t

í

<u>løgtingsmáli nr. 59/1989: Veðhald fyri lánum til smærri íðnaðarvirkir.</u>

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 24. januar 1990 og eftir 1. viðgerð 31. januar beint í íðnaðarnevndina.

Samd nevnd mælir løgtingnum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó við teirri broyting, at veðhaldið í lógini verður einfalt veðhald, soleiðis sum nú er praksis í landsstýrinum mótvegis áður sjálvskuldaraveðhald og setir tí fram samsvarandi hesum soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður aftan á orðið "veita" sett: "einfalt".	I § 1 indsættes efter ordet "yde": "simpel".

ÍDNAÐARNEVNDIN, 28. mars 1990.

Edmund Joensen Heini O. Heinesen John Petersen

Vilhelm Johannesen Niels Pauli Danielsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

22. januar 1989

F. L. j. nr. 1500-1-11-3

Tlf. 11088 . Telex 81310 lbgmn fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

KjH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 60/1989: Sinamillum fiskirættindi í 1990 millum Týska Demokratiska Lýðveldið (DDR) og Føroyar.

U p p s k o t

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu semju dagfest 10. januar 1990 um sinamillum fiskirættindi í 1990 millum Føroyar og Týska Demokratiska Lýðveldið (DDR).

Viðmerkingar:

DDR fekk í 1987 loyvi at veiða 10.000 tons av svartkjafti og fyri fyrstu ferð kunnu í staðin fyri 1.000 tons av svartkjafti 1.500 tons av makreli verða veidd av DDR-fǫrum. Skipatalið var óbroytt.

Vanliga hava føroysk fiskifør havt ógvuliga lítlan áhuga fyri at fiska í DDR-sjógvi. Hóast tað at rættiliga stórar nøgdir verða veiddar av toski í Vestara partinum av Eystrasalti, tykist hetta ongantíð at hava havt áhuga føroyinga, helst tí fiski-møguleikarnir hava verið ríkiliga góðir eystanfyri.

Av hesum orsøkum og eisini tí at annað samstarv sambært § 1, stk. 2 í fiskivinnusáttmálanum millum Føroyar og Týska Demokratiska Lýðveldið frá 14. mai 1986 varð farið fyri skeytið, varð støðið í sínamillum fiskirættindunum fyri 1988 lækkað.

Svartkjaftakvotan hjá DDR varð lækkað niður í eina helvt og toskakvotan hjá Føroyum varð lækkað niður í 58% av 1987-kvotuni. Annars vóru treytirnar fyri umbýti við síld og makrel sum árið fyri. Við hesum góðtók DDR eisini í 1988 at gjalda meira fyri svartkjaftin. Býtislutfallið millum tosk og svartkjaft broyttist frá 7,69 kilo av svartkjafti fyri hvørt kilo av toski til 6,67 kilo.

Í 1988 hendi so tað, at knappliga høvdu eyctursjóvarbátarnir áhuga fyri at veiða í DDR-sjógvi. Kvotan varð uppfiskað og neyðugt varð at biðja DDR um eina eykakvotu uppá 100 tons. Hendan varð játtað uttan krav um mótrokning. Eisini gav DDR givið loyvi til á conto fiskiskap til sáttmáli er gjørdur fyri 1989.

Aftur ímóti nýtti DDR í 1988 bert lítlan part av síni kvotu uppá 5.000 tons, ikki meir enn 1.700 tons vóru fiskað.

Í 1989 góðtók DDR í Baltisku fiskivinnunevndini ein niðurskurð í heildartoskakvotu síni í Eystursjónum úr 6.550 tonsum í 4.000 tons í 1989.

Í 1990 er toskakvotan hjá DDR í Baltisku fiskivinnunevndini aftur sett til 4.000 tons.

Í 1989 nýtti DDR 3.346 tons av síni 6.000 tons kvotu undir Føroyum. Førcyar fiskaðu út móti 700 tonsum av 750 tonsum í DDR sjógvi.

Samráðingarheimildin hjá føroysku samráðingarnevndini var at fáa støðið so langt sum møguligt upp móti støðinum, sum tað var í 1987 og undan og í minsta lagi at varðveita støðið frá 1989.

Sum tað sæst av hjáløgdu protokol, so eydnaðist tað at økja kvotuna úr 750 tonsum í 800 tons.

Samstundis bøttist býtislutfallið til føroyskan fyrimun, so at 375 tons av toski kunnu býtast við 750 tons av síld (1:2) (563 tons av síld ella 1:1,5 í fjør) og býtislutfallið í kvotuni hjá

DDR millum svartkjaft og makrel varð sett niður úr 1,5 til 1,0.

DDR varðveitti somu kvotu í svartkjafti, men fekk rætt at býta fleiri tons um til makrel, upp til 2.000 tons av makreli móti 2.000 tons av svartkjafti (í fjør 900 tons av makreli móti 600 tonsum av svartkjafti).

Kvota

Føroyar

	1987	1988	1989	1990
Toskur	1.300	750	750	800[1]

([1]375 tons kunnu skiftast um við síld í býtislutfallinum 1:2)

DDR

	1987	1988	1989	1990
Svartkjaftur	10.000	5.000	6.000	6.000[2]

([2]2.000 tons kunnu skiftast um við makrel í býtislutfallinum 2:3)

Tal av fiskiloyvum hjá DDR og Føroyum vera ávikavist 5 og 15 (12 í senn).

Partarnir samdust um, nú so mikið er útliðið, at royna at fáa sáttmálaviðurskiftini avgreidd skjótast gjørligt.

Sáttmálarnir á týskum, føroyskum og donskum eru heftir upp í tingmálið.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/ Kjartan Hoydal

Samráðingar DDR - Føroyar 9. - 10. januar 1990 í Tórshavn.

Føroyska sendinevndin:

Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri, samráðingarleiðari
Jørgen Hansen, fulltrúi, Føroya Landsstýri
Tryggvi Johansen, leiðari, Føroysk Viðskiftastova
Vinjard Joensen, Føroya Reiðarafelag
Árni Olafsson, ráðgevi, uttanríkismálaráðið

Sendinevndin úr DDR:

Fritz Hartung, aðalstjóri, VEB Fischimpex
Jurgen Isernhagen, VEB Fischimpex
Hans Jurgen Brandt, Vaktartænastan í VEB Fischimpex

P R O T O K O L

millum umboð fyri danskar og føroyskar myndugleikar øðrumegin og umboð fyri fiskivinnuna í DDR hinumegin um fiskiskap í árinum 1990.

Sendinevndirnar eru komnar ásamt um at leggja niðanfyri standandi uppskot fram fyri myndugleikar teirra til góðkenningar:

1. VEB Fischkombinat Rostock fær í árinum 1990 eina kvotu uppá 6.000 tons av svartkjafti á fiskiøki Føroya. Av hesum kunnu 2000 tons av svartkjafti umskiftast við 2000 tons av makreli.

2. Føroyar fáa á fiskiøki DDR í 1990 eina kvotu uppá 800 tons av toski. Av hesi kunnu í staðin fyri upp til 375 tons av hesi toskakvotu veiðast upp til 750 tons av sild.

3. Talið av skipum úr DDR, sum kunnu veiða kvotuna á fiskiøki Føroya, er avmarkað til 5 før. Føroyar kunnu til veiðu av kvotuni á fiskiøki DDR nýta 15 før. Av hesum kunnu tó í mesta lagi 12 fiska samstundis á fiskiøki DDR.

4. Fiskifør undir føroyskum flaggi, sum í 1990 hava fingið loyvi frá fiskieftirlíti DDR til at fiska á fiskiøki DDR, hava samstundis loyvi at fiska á eini leið innan fyri sjóøki DDR.

5. Partarnir royna at fáa í lag notuskifti til at játta sáttmálarnar um fiskiskap í 1990 áðrenn 1. februar 1990.

Tórshavn, 10. januar 1990.

Kjartan Hoydal (sign.)

Fritz Hartung (sign.)

P R O T O K O L

for 1990

Mellem repræsentanter for danske og færøske myndigheder på den ene side og repræsentanter for DDR's fiskerierhverv på den anden side om fiskeri i 1990.

Delegationerne er enedes om at forelægge deres myndigheder følgende forslag til godkendelse:

1. VEB Fischkombinat Rostock får i året 1990 en kvote for blåhvilling på 6.000 tons i Færøernes fiskerizone, hvoraf der valgfrit i stedet for indtil 2000 tons blåhvilling af denne kvote kan fiskes indtil 2000 tons makrel.

2. Færøerne får i DDR's fiskerizone i året 1990 en kvote på 800 tons torsk, hvoraf der valgfrit i stedet for indtil 375 tons torsk af denne kvote kan fiskes indtil 750 tons sild.

3. Antallet af skibe til udnyttelse af kvoten i Færøernes fiskerizone er begrænset til 5 fartøjer. Færøerne kan til udnyttelse af kvoten i DDR's fiskerizone anvende 15 fartøjer. Dog må kun 12 af disse fartøjer fiske i DDR's fiskerizone samtidig.

4. Fiskefartøjer under færøsk flag, der for året 1990 har fået tildelt licenser til fiskefangst i DDR's fiskerizone af DDR's fiskeriinspektion, har samtidig tilladelse til gennemførelse af fiskeri i et område inden for DDR's territorialfarvande.

5. Parterne bestræber sig på at gennemføre udvekslingen af noter til bekræftelse af aftalerne om fiskeriet i året 1990 inden den 1. februar 1990.

Tórshavn, den 10. januar 1990.

Kjartan Hoydal (sign.)

Fritz Hartung (sign.)

P R O T O K O L

für 1990

Zwischen Vertretern der Fischwirtschaft der DDR einerseits und Vertretern der dänischen und färöischen Behörden andererseits über die Fischerei im Jahr 1990.

Die Delegationen haben sich geeinigt, ihren Behörden folgende Vorschläge zur Bestätigung zu unterbreiten:

1. Dem VEB Fischkombinat Rostock wird für das Jahr 1990 eine Quote von Blauem Wittling in Höhe von 6.000 t in der Fischereizone der Färöer erteilt, wobei wahlweise anstatt bis zu 2000 t Blauer Wittling aus der Gesamtquote bis zu 2000 t Makrele gefischt werden können.

2. Die Färöer erhalten in der Fischereizone der DDR im Jahr 1990 eine Quote von 800 t Dorsch, wobei wahlweise anstatt bis zu 375 Dorsch aus der Gesamtquote bis zu 750 t Hering gefischt werden können.

3. Die Anzahl der Schiffe der DDR zum Abfischen der quote in der Fischereizone der Färöer wird auf 5 Fang- und Verarbeitungsschiffe begrenzt. Die Färöer können zum Abfischen der Quote in der Fischereizone der DDR 15 Fahrzeuge einsetzen. Von diesen Fahrzeugen dürfen jedoch höchstens 12 Fahrzeuge gleichzeitig in der Fischereizone der DDR fischen.

4. Den Fischereifahrzeugen unter der Flagge der Färöer, die für das Jahr 1990 vom Fischereiaufsichtsamt der Deutchen Demokratischen Republik Lizenzen für den Fischfang innerhalb der Fischereizone der DDR erhalten, ist gleichzeitig die Fischereidurchführung in einem Gebiet innerhalb der Territorialgewässer der DDR gestattet.

5. Beide Seiten streben an, den Notenaustausch zur Bestätigung der Vereinbarungen zu Fischerei im Jahre 1990 bis zum 1.2.1990 durchzuführen.

Tórshavn, am 10. Januar 1990.

Kjartan Hoydal (sign.)

Fritz Hartung (sign.)

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

22. januar 1990

F. L. j. nr.
(at tilskilja í svari)

Tlf. 11080 . Telex 81310 tingns fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt
AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 61/1989: Broyting í løgtingslóg um almenn kunngerðablað.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenn kunngerðablað.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om offentlig kundgørelsestidende.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um almenn kunngerðablað verður § 5 strikað.

§ 1.

I lagtingslov nr. 109 af 17. december 1987 om offentlig kundgørelsestidende udgår § 5.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1990.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1990.

Viðmerkingar:

§ 5 í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 sigur, at alt yvirvald, sorinskrivari, postverk og kommunustýrir fáa ókeypis eintak av kunngerðablaðnum.

Fyri at lætta um umsitingina hevur landsstýrið mett, at øll,

eisini almennir stovnar, eiga at rinda fyri Kunngerðablaðið.

Landsstýrið hevur við kunngerð frá 8. september 1988 ásett haldaragjaldið til 50 kr. um ársfjórðingin og skuldi hetta sostatt ikki komið at lastað fíggjarætlanina hjá almennu stovnunum stórvegis.

Landsstýrið mælir tinginum til at samtykkja broytingina.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

<u>løgtingsmáli nr. 51/1989: Broyting í løgtingslóg um almant kunngerðablað.</u>

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 24. januar 1990 og eftir 1. viðgerð 31. januar beint í rættarnevndina.

Samd nevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskotið, men verður neyðugt, at greinanumrini verða flutt samsvarandi broytingini, og setir rættarnevndin sostatt fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður sett sum stk. 2:	I § 1 indsættes som stk. 2:
"§§ 6 og 7 verða §§ 5 og 6."	"§§ 6 og 7 bliver §§ 5 og 6."

Eisini setir ein samd nevnd fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>samtyktar</u>

Løgtingið heitir á landsstýrið um at gera tiltøk til tess at fremja meiri almenna kunning av innihaldinum í kunngerðablaðnum.

RÆTTARNEVNDIN, 21. mars 1990.

Jógvan Durhuus Poul Michelsen Eilif Samuelsen

Marita Petersen Tordur Niclasen

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURDS- OG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 62/1989: Meirnýtsla landskassans 1988

U p p s k o t

til

samtyktar

"Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at seta nevnd av óvildugum persónum at kanna og skriva álit um meirnýtslu landskassans fyri 1988, og at hetta verður lagt fyri tingið til viðgerðar, samstundis sum almenningurin fær úrslitið av kanningini at vita".

Viðmerkingar:

I hesum dogum er tað ikki so løgið, at almenningurin er forvitin at vita, hvussu skattapeningur hansara verður og hevur verið umsitin av landsins myndugleika.

Vælskiljandi hava tí eisini verkafelog kring landið krevt lmenna hoyring viðvíkjandi "Hagadrangi".

Tá einki eigur at verða at dylja í slíkum máli, er ynski verkafelaganna heilt rímiligt og eigur at vinna frama.

Hvussu skattgjaldarans peningur á øðrum økjum er umsitin eigur somuleiðis ikki at vera fjalt fyri almenningunum.

Her verður t.d. meirnýtsla landskassans fyri 1988 havt í huga.

Í skrivi frá landsstýrinum til løgtingsins fíggjarnevnd 27.okt. 1989 verður upplýst, at meirnýtsla landskassans fyri 1988 er heilar 244.072.918,19 kr.

Upplýst er somuleiðis, at av hesi upphædd hevur fíggjarnevndin góðtikið góðar 43.000.000.

Í fylgiskrivi frá Føroya Gjaldstovu verður eisini upplýst, at t.d. játtanin til ávísan grunn var kr. 80.000.000 meðan samlaða ýtslan hetta árið var 136.8 mió.kr. Ein meirnýtsla upp á kr.56.8 mió.

Meirnýtslan úr hesum o.ø. grunnum er ikki íroknað tær 244 mió. kr., so roknast má við, at tann veruliga meirnýtslan hetta árið hevur verið munandi hægri.

Náttúrligur spurningur ið reisist í hesum sambandi er,hvussu við heimildini fyri slíkari meirnýtslu??

Frá ymiskum síðum hevur mangt og hvat verið ført fram um hesi viðurskifti - og tá ofta ósakligt og einvíst.

Tí er tað umráðandi, at veruleikin verður lagdur á borðið og at skattgjaldarin ikki verður hildin fyri gjøldur av teim, ið royna at sleppa sær undan ábyrgd.

Umrøddu meirnýtsla eigur ikki bara " stillisliga at fara aftur við borðinum" - ei heldur bert "at hanga í leysari luft", men heldur at fáast uppá plás,soleiðis at skilja, at ábyrgdin verður løgd, har hon eigur at liggja.

Óneyðugt skuld verið at lagt afturat, at í hesum døgum, har ítróðrar-og tiskimaðurin, verkamaðurin og aðrir skattgjaldarar, merkja nívandi byrðar á sínum herðum - og hava trupult at fáa endarnar at røkka, er tað teim sera hugstoytt fyrst at gjalda rokningina hjá øðrum, og so enntá ikki at vita ella hava trygd fyri hvat peningurin í veruleiaknum verður nýttur til.

Á FØROYA LØGTINGI, 23. januar 1990

Tordur J. Niclasen

A l i t

i

løgtingsmáli nr. 62/1989: Meirnýtsla landskassans.

Málið er framlagt av Kristiligа Fólkaflokkinum Framburðs- og fiskivinnuflokkinum tann 31. januar 1990 og eftir 1. viðgerð 6. mars beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Anfinn Kallsberg, Heini O. Heinesen, Jógvan Durhuus, Eilif Samuelsen, Flemming Mikkelsen og Jørgen Thomsen) førir fram.

Landsstýrið hevur biðið Grannskoðaradeildina um at kanna meirnýtsluna hjá landskassanum fyri 1988.

Hendan kanning er liðug og latin landsstýrinum, sum í løtuni viðgerð hesa.

Fíggjarnevndin fer í samráð, við landsstýrið eisini at viðgera kanningina, og vil í komandi tingsetu leggja úrslitið av hesum fyri løgtingið. Út frá hesum heldur meirlutin, at setningurin í uppskotinum er framdur, og setur ti einki uppskot fram.

Minnilutin (Tordur Niclasen) mælir til at samtykkja uppskotið.

FÍGGJARNEVNDIN, 25 mai. 1990.

Anfinn Kallsberg — Flemming Mikkelsen — Heine O. Heinesen

Eilif Samuelsen — Jørgen Thomsen — Jógvan Durhuus

Tordur Niclasen.

SJÁLVSTYRISFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 63/1989: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag til lagtingsmænd.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 51 frá 9. mai 1976 um samsýning løgtingsmanna verða gjørdar hesar broytingar:	I lagtingslov nr. 51 fra 9. mai 1976 om vederlag til lagtingsmænd foretages følgende ændringer:
1) § 2 verður strikað.	1) § 2 udgår.
2) § 3 verður strikað.	2) § 3 udgår
3) § 4 verður strikað.	3) § 4 udgår
§ 2.	§ 2.
Orðið "bíðipeningur" í § 7, stk. 1 og 2 verður strikað.	I § 7, stk. 1 og 2 udgår ordet "ventepenge".

§ 3.

Hinar greinarnar verða broyttar samsvarandi hesum.

§ 3.

De øvrige paragraffer ændres i overensstemmelse hermed.

§ 4.

Henda lóg kemur í gildi 1. februar 1990.

§ 4.

Denne lov træder i kraft 1. februar 1990.

Viðmerkingar:

Tað er freistandi at mæla tinginum til at samtykkja hesar broytingar við afturvirkandi kraft soleiðis, sum samgongan hevur í sambandi við bundnu tvungnu uppsparingina, men av tí at Sjálvstýrisflokkurin undir ongum umstøðum kann góðtaka slíka tilvildarliga løggeving, verður hetta ikki gjørt.

Sjálvstýrisflokkurin hevur klárt og týðuliga sagt frá, at skal nakar spara, so skal fyrst og fremst byrjast við landsstýris- og løgtingsmonnum.

Men í staðin valdi samgongan at leggja á, har garðurin var lægstur, nevniliga at krevja bundna tvungna uppsparing frá øllum skattaborgarum landsins. Hesari neyðtøku mótmælti Sjálvstýrisflokkurin.

Sjálvstýrisflokkurin mælti til, at bíðipeningurin til landsstýris- og løgtingsmenn varð settur til 0. Men hetta uppskot varð ikki samtykt.

Orsøkin til at meirilutí ikki fekst fyrí hesi broyting, var uttan iva tann, at "bíðipeningurin" er staðfestur við lóg, og at tað tí er neyðugt at broyta sjálva lógina, og tað verður gjørt við hesum báðum uppskotunum til broytingar í lógunum, sum umfata bíðipening.

Sjálvt um lønirnar hjá landsstýris- og løgtingsmonnum hava verið endurgivnar í fjølmiðlunum áður, so er kortini neyðugt at gera tað í sambandi við hesa viðgerðina. Men av tí, at tað ikki ber til at fáa tey heilt nágreinligu tølini, so verður komið við eini meting, sum er rættiliga tætt upp ímóti veruligu støðuni.

Lønin hjá løgtingsmanninum.

Ímynda vit okkum ein fyrrverandi landsstýrismann, ið verður valdur inn á ting og samstundis hevur eitt gott og fjálgt alment starv at koma aftur til, so er støðan hendan:

1.	Almenna fjálga starvið	kr. 25/30.000 pr. mánað.
2.	Bíðiløn sum landsstýrismaður	kr. 12.000 pr. mánað.
3.	Løgtingsmannaløn	kr. 16.000 pr. mánað.
4.	Koyripeningur (skattafríur)	kr. 4/8.000 pr. mánað.
5.	Nevndarformansløn	kr. 5.000 pr. mánað.
6.	Fundarpeningur annars	kr. 2.000 pr. mánað.
	Løn tilsamans	kr. 59/73.000 pr. mánað.

Lønin hjá landsstýrismanninum.

Tað, sum er galdandi fyri teir, sum í dag manna landsstýri, er, at fimm eru valdir tingmenn, meðan tann eini er fyrrverandi tingmaður. Løn teirra er mett at vera henda:

1.	Landsstýrismannaløn	kr. 33/35.000 pr. mánað.
2.	Bíðiløn sum tingmenn	kr. 10/15.000 pr. mánað.
3.	Koyripeningur (skattafríur)	kr. 8/16.000 pr. mánað.
	Løn tilsamans	kr. 51/66.000 pr. mánað.

Nývaldur tingmaður.

Hvussu er so støðan hjá vanliga tingmanninum, tí nývalda, sum fyrstu ferð kemur inn um tingsins gátt. Teirra støða er mett at vera henda:

1.	Fjálga borgarliga almenna starvið	kr. 25/30.000 pr. mánað.
2.	Tingmannaløn	kr. 16.000 pr. mánað.
3.	Koyripeningur (skattafríur)	kr. 4/15.000 pr. mánað.
	Løn tilsamans	kr. 45/61.000 pr. mánað.

Sjálvsagt eru hesi viðurskifti ikki galdandi fyri verkafólk, sjófólk og fólk frá fríu vinnuni. Tey hava ikki alment starv at koma aftur til.

Men vert er at leggja til merkis, at lønin hjá hjúnarfelagnum er ikki roknað uppí omanfyri standandi yvirlitið.

Sum tað týðuliga sæst, sita m.a. samgongumenn fjálgir og tryggir á rókini, og hava við slíkum lønum ongan muguleika at hugsa sum vanlig fólk/lønmóttakarar. Hjá teimum ger tá lítlan og ongan mun, at skattastigin er sprongdur í stumpar og stykkir, og at bundna tvungna uppsparingin er samtykt við lóg.

Men spurningurin er, hvat tað, er sum ger, at ávis fólk hava fimm ferðir so nógva løn sum tann vanligi lønmóttakarin? Svarið er heilt einfalt - absolut einki!

Og tí verður hetta uppskot lagt fram, og samstundis hetta:

I U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at spardi peningurin í sambandi við bíðipening til landsstýris- og løgtingsmenn fer í grunn til arbeiðsleysar føroyingar, og at sama upphædd tey komandi árini fer í grunnin.

II U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at spardi peningurin í sambandi við politiska upplýsing fer í grunn til arbeiðsleysar føroyingar, og at sama upphædd tey komandi árini fer í grunnin.

III U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at koma við yvirliti yvir formanslønir, samsýningar, fundarpening v.m.

Á FØROYA LØGTINGI, tann 24. januar 1990

Lasse Klein

Á l i t

í

<u>løgtingsmáli nr. 63/1989: løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.</u>

Málið er framlagt av sjálvstýrisflokkinum tann 24. januar 1990 og eftir 1. viðgerð 31. jasnuar 1990 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um, at bíðipeningur landsstýris- og løgtingsmanna í ávísan mun er órímiligur, sum t.d. tá løgtingsmaður verður landsstýrismaður og tá landsstýrismaður verður løgtingsmaður. Men her eins og í øðrum spurningum hesum viðvíkjandi eru nógvar fyritreytir, sum mugu takast við í eina heild, tá lógin verður broytt, sum eitt dømi kann nevnast, at um løgtingsmaður eisini hevur annað alment arbeiði, og fær í boði at taka við sum landsstýrismaður, so fær hann munandi meira arbeiði og fær munandi minni løn.

Hetta og nógvir aðrir spurningar av sama slag arbeiða landsstýrið og fíggjarnevndin í felag við. Landsstýrið hevur longu nú gjørt kunngerð viðvíkjandi løn hjá løgtingsmonnum, sum eisini hava aðra almenna løn. Henda viðgerðin tekur langa tíð, og tí vilja fíggjarnevndin og landsstýrið arbeiða viðari við hesum spurningi og koma við einum samlaðum uppskoti viðvíkjandi samsýning landsstýris- og løgtingsmanna.

Út frá nesum setur ein samd nevnd soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrið og løgtingsins fíggjarnevnd arbeiða við broytingum í løgtingslógum um samsýning til landsstýrismenn og løgtingsmenn og leggur uppskot hesum viðvíkjandi fyri løgtingið í komandi tingsetu.

FÍGGJARNEVNDIN, 25. mai 1990.

Anfinn Kallsberg	Flemming Mikkelsen	Heine O. Heinesen
Eilif Samuelsen	Jørgen Thomsen	Jógvan Durhuus

Tordur Niclasen

SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 64/1989: Broyting í fíggjarløgtingslógini fyri 1990.

U p p s k o t

til

broyting í fíggjarløgtingslógini fyri 1990.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 124 frá 30. december 1989 um fíggjarløgtingslógina fyri 1990 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Undir § 20 verður konto 103612 bíðipeningur settur til 0.
2) Undir § 22 verður konto 253808 studningur til politiska upplýsing settur til 0.

§ 2.

Henda lógin kemur í gildi 1. februar 1990.

ændring i finanslagtingslov for 1990.

§ 1.

I lagtingslov nr. 124 af 30. december 1989 om finanslagtingslover for 1990 foretages følgende ændringer:

1) I § 20 ændres konto 103612 ventepenge til 0.
2) I § 22 ændres konto 253808 tilskud til politisk oplysning til 0.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. februar 1990.

Viðmerkingar:

Sí viðmerkingar til løgtingsmál nr. 63.

Á FØROYA LØGTINGI, 23. januar 1990

Lasse Klein

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 64/1989: Broyting í figgjarløgtingslógini fyri 1990.

Málið er framlagt av Sjálvstýrisflokkinum tann 24. januar 1990 og eftir 1. viðgerð 31. januar 1990 beint í figgjarnevndina.

Víst verður til álit í løgtingsmáli nr. 63/1989.

FÍGGJARNEVNDIN, 25. mai 1990.

Anfinn Kallsberg Flemming Mikkelsen Heine C. Heinesen

Eilif Samuelsen Jørgen Thomsen Jógvan Durhuus

Tordur Niclasen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

TIL 11000 . Telex 81310 lingua fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

14. februar

F. L. j. nr. 1400-5-1
(at tíkkila í svari)

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 65/1989: Lóg um innsetaratrygdargrunn.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 850 frá 23. desember 1987 "om indskydergarantifond" verður lýst at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur frá ríkisumboðnum fingið fyrispurning um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 850 frá 23. desember 1987 um ein innsetaratrygdargrunn verður sett í gildi fyri Føroyar.

Sambært lógini skulu peningastovnarnir í Føroyum verða við í danskari skipan, har peningastovnarnir gjalda inn í ein innsetaratrygdargrunn, sum er skipaður sum ein sjálvsognarstovnur.

Um so er, at ein peningastovnur fer konkurs, veitir trygdargrunnurin trygd fyri upp til 250.000 kr. pr. innsetara og ávísar konti sum t.d. kapitalpensjónskonti og barnauppsparingarkonti tryggjar grunnurin við fullari upphædd.

Málið hevur verið til ummælis hjá øllum peningastovnum, og hevur landsstýrið fingið ummæli frá Sjóvinnubankanum, Fossbankanum, Norðcya Sparikassa og Suðuroyar Sparikassa.

Allir hesir peningastovnar mæla til, at lógin verður lýst at galda fyri Føroyar.

Norðoya Sparikassi hevur í sínum ummæli ta viðmerking, at hann vónar, at føroyski kapitalurin verður verandi í Føroyum, og at hóskandi upphædd fer at standa í Norðoya Sparikassa, tá teirra partur verður eitt "føliligt likviditetsdren", um upphæddin verður flutt í annan stovn.

Til hetta er at viðmerkja, at sambært § 10 í lógini, verður ogn grunsins fyrisitin av tjóðbankanum. Tryggjast skal peninginum hægst møgulig renta og skal hann til eina og hvørja tíð í nór stóran mun skal vera til taks.

Landsbankin hevur mett, at føroysku peningastovnarnir fara at skjóta inn umleið 50-60 mió. kr. av samlaðu grunduppheddina uppá 3.000 mió. kr.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 65/1989: Lóg um innsetaratrygdargrunn.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 14. februar 1990 og eftir 1. viðgerð 21. mars beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir samd nevnd tinginum til at samtykkja málið.

RÆTTARNEVNDIN, 24. apríl 1990.

Jógvan Durhuus Marita Petersen Poul Michelsen

Tordur Niclasen Eilif Samuelsen

SJÁLSTÝRISFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 66/1989: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýring landsstýrismanna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 39 frá 5. august 1971 um samsýning landsstýrismanna verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2 verður strikað.
2) § 3 verður strikað.
3) § 4 verður strikað.

§ 2.

Hinar greinirnar verða broyttar samsvarandi hesum.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi 1. februar 1990.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag til landsstyresmænd

§ 1.

I lagtingslov nr. 39 af 5. august 1971 om vederlag til landsstyremænd foretages følgende ændringer.

1) § 2 udgår.
2) § 3 udgår.
3) § 4 udgår.

§ 2.

De øvrige paragraffer ændres i overensstemmelse hermed.

§ 3.

Denne lov træder i kraft den 1. februar 1990.

VIÐMERKINGAR

Uppskot um broytingar í §. 2, 3 og 4 snúgva seg um býðilønina hjá landsstýrismonum. Sí annars viðmerkingar í sambandi við uppskot til løtingslóg um broyting í løgtingslóg u samsýning løgtingsmanna.

Á FØROYA LØGTINGI, tann 22. januar 1990

Lasse Klein

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 66/1989: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna.

Málið er framlagt av sjálvstýrisflokkinum tann 24. januar 1990 og eftir 1. viðgerð 31. januar 1990 beint í fíggjarnevndina.

Vist verður til álit í løgtingsmáli nr. 63/1989.

FÍGGJARNEVNDIN, 25. mai 1990.

Anfinn Kallsberg Flemming Mikkelsen Heine O. Heinesen

Eilif Samuelsen Jørgen Thomsen Jógvan Durhuus

Tordur Niclasen

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 67/1989: løgtingslóg um innlit í almenna fyrisitingin.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um innlit í almenna fyrisiting.

Kapittul I.

§ 1. Øll hava rætt at krevja at gerast kunnug við skjøl í málum, sum almenna fyrisitingin viðger ella hevur viðgjørt.

2. stk. Áheitanin skal vísa á tað mál, hvørs skjøl viðkomandi krevur at gerast kunnugur við.

§ 2. Rætturin at fáa upplýsingar umfatar ikki skjøl, sum eru um:

1) Persónlig og fíggjarlig viðurskifti hins einstaka.
2) Tekniskar skipanir ella arbeiðshættir. Rakstrar- ella handilsviðurskifti, tá hesi hava stóran fíggj-

lagtingslov om indblik i offentlig administration.

Kapitel I.

§ 1. Alle har ret til at forlange at blive gjort bekendt med dokumenter i sager, som den offentlige administration behandler eller har behandlet.

Stk. 2. Anmodningen skal henvise til den sag, hvis dokumenter vedkommende kræver at blive bekendtgjort med.

§ 2. Retten til at få oplysninger omfatter ikke dokumenter, der omhandler:

1) Personlige og økonomiske forhold hos enkelt person.
2) Tekniske systemer eller arbejdsmåder. Drifts- eller handelsforhold, såfremt disse har stor øko-

arligan týdning fyri ein einstaka ella virkið, upplýsingarnar eru um.

2. stk. § 1 kann heldur ikki brúkast, tá kravið at gerast kunnug við málið tykist at mega víkja fyri týdningarmiklum grundum viðvíkjandi:

1) trygd landsins, verju landsins og viðurskifti við aðrar tjóðir ella millumtjóða stovnar.
2) Almennum eftirliti, stýrignum og tilrættalegging ella verkætlanum um skatt og avgjøld.
3) Almennum búskaparligum áhugamálum, almenn handilsmál tald við.
4) Vernd av øðrum áhugamálum, tá serlig viðurskifti krevja, tey eru loynilig.

3. stk. Fevna §§ 1 og 2 bert um ein part av skjalinum, skal viðkomandi gerast kunnugur við restina av skjalinum.

4. stk. Landsstýrismaður í viðkomandi máli kann avgera, at málsøki ella skjalaslag, sum eftir 1. og 2. stk. vanliga ikki hevði verið játtað inntil í § 1, skulu verða undantikin § 1.

§ 3. Undantiknar §§ 2 og 5

nomisk betydning for den enkelte eller virksomheden, oplysningerne refererer sig til.

Stk. 2. § 1 må heller ikke anvendes, når kravet om at blive bekendtgjort med sagen synes at vige fra betydningsfulde årsager vedrørende:

1) landets sikkerhed, landets forsvar og forhold med andre nationer eller mellemfolkelige institutioner.
2) Offentlig kontrol, styring eller tilrettelægning eller arbejdsplaner vedrørende skatter og afgifter.
3) Offentlige økonomiske spørgsmål, heri offentlige handelssager.
4) Beskyttelse af andre interesser, når særlige forhold udkræver, at disse er hemmelige.

Stk. 3. Omfatter §§ 1 og 2 kun en del af dokumentet, skal vedkommende gøres bekendt med den resterende del af dokumentet.

Stk. 4. Landsstyresmanden i vedkommende sagsområde kan afgøre, at sagsområdet eller sagskategorier, som efter stk. 1 og 2 ikke sædvanligvis ville have været bevilget eller imødekommet i henhold til § 1, skal undtages fra § 1.

§ 3. Undtagne §§ 2 og 5 omfat-

umfatar rætturin upplýsingar um:

1) Øll skjøl viðvíkjandi málinum, eisini avrit av skjølum, myndugleikarnir hava skrivað, tá hildið verður, móttakarin hevur fingið tey.
2) Uppskriftir í journalum, skrásetingar og onnur yvirlit yvir skjøl í málinum.

§ 4. Fáa myndugleikarnir fráboðaðar munnligar veruligar upplýsingar, sum hava avgerandi týdning fyri eitt mál, skulu tær skrivast á ein slíkan hátt, at tær kunnu latast í tráð við hesa lóg.

§ 5. Rætturin at fáa upplýsingar umfatar ikki:

1) Frásagnir frá fundum millum landsstýrismenn og skjøl, gjørd til hesar fundir.
2) Brævaskifti millum landsstýrismenn um lógir, eisini inntøkulógir.
3) Innanhýsis arbeiðstilfar hjá myndugleikunum, eitt nú frásagnir, skriv, útkast, uppskot og ætlanir.
4) Brævaskifti í sama stovni.
5) Brævaskifti millum bý-/bygdarráð og deildir og nevndir teirra ella aðrar

ter retten oplysninger om:

1) Alle dokumenter vedrørende sagen, også afskrifter af dokumenter, som myndighederne har skrevet, når der er årsag til at formode, at modtageren har modtaget disse.
2) Noteringer i journaler, registreringer og andre oversigter over dokumenter i sagen.

§ 4. Får myndighederne meddelelse mundligt om vaktiske oplysninger, som er af afgørende betydning for en sag, skal disse noteres på en sådan måde, at de kan udleveres i overensstemmelse med denne lov.

§ 5. Retten til at få oplysninger omfatter ikke:

1) Referater fra møde mellem landsstyresmænd og dokumenter, der er produceret til disse møder.
2) Korrespondance mellem landsstyresmænd om love, også indkomstlove.
3) Internt arbejdsmateriale for myndighederne, f.eks. referater, breve, udkast, forslag og planer.
4) Korrespondance i samme institution.
5) Korrespondance mellem by-/bygderåd og afdelinger og

fyrisitingarligar stovnar og stovnanna millum.

6) Uttanríkispolitisk skjøl og uttanríkis búskaparlig viðurskifti.

7) Brævaskifti millum myndugleikar og serkøn at brúka í rættarmálunum, ella tá støða skal takast til møguligt rættarmál.

8) Tilfar, sum verður brúkt sum grundarlag undir almennum hagtølum.

§ 6. Rætturin at fáa upplýsingar umfatar ikki revsimál ella mál um starvssetanir ella framtlyting í almennari tænastu.

2. stk. Er talan um lóggávumál, eisini inntøkulógir, skal áheitan sambært § 1 ikki játtast, fyrr enn uppskotið er lagt fram í løgtinginum.

§ 7. Skyldan at geva upplýsingar er avmarkað hjá fólki í almennari tænastu, sum hava lógarfesta tagnarskyldu.

2. stk. Hetta er tó ikki galdandi, tá talan er um vanliga tagnarskyldu sambært revsilógini og tænastumannalógini.

deres udvalg eller andre administrationsudvalg og indbyrdes mellem institutionerne.

6) Udenrigspolitiske dokumenter og udenrigs økonomiske forhold.

7) Korrespondance mellem myndigheder og sagkyndige, der skal anvendes i retssagerne, eller når der skal tages stilling til en mulig retssag.

8) Materiale, der anvendes som grundlag for offentlige statistikker.

§ 6. Retten til at få oplysninger omfatter ikke straffesager eller spørgsmål om ansættelser eller opnormeringer i offentlig tjeneste.

Stk. 2. Såfremt det drejer sig om lovgivningsspørgsmål, også indkomstlove, kan anmodningen i henhold til § 1 ikke imødekommes, inden forslaget er fremlagt i lagtinget.

§ 7. Pligten til at meddele oplysninger er begrænset hos personer i offentlig tjeneste, der har lovfæstet tavshedspligt.

Stk. 2. Dette er dog ikke gældende, så fremt der er tale om sædvanlig tavshedspligt i henhold til straffeloven og tjenestemandsloven.

§ 8. Spurningin, um upplýsingar skulu latast, avger viðkomandi myndugleiki, sum annars hevur avgerðarrætt í málinum, uttan so at viðkomandi landsstýrismaður avger annað.

2. stk. Umhugsandi neyðugu avgreiðsluna av málinum avgerð viðkomandi myndugleiki, um áheitanin sambært § 1 verður játtað beinanvegin ella seinni. Um tann, komin er við áheitanini verður gjørdur kunnugur við skjølini soleiðis, at hann fær loyvi at hyggja í tey á staðnum, ella hann fær avrit ella ljósrit av teimum.

3. stk. Landsstýrismaðurin í lógarmálum hevur rætt til at áseta reglur um gjald fyri avrit ella ljósrit.

§ 9. Landsstýrismaðurin hevur rætt til at avgera, at upplýsingar í teimum ávisu skjølunum kunnu latast eftir eitt ávist tíðarskeið uttan mun til reglurnar í hesum parti.

§ 8. Spørgsmålet, om oplysninger skal overlades til vedkommende bemyndighedsbeslutning, som ellers har bestemmelsesret i sagen, dog med den undtagelse at vedkommende landsstyremand træffer anden afgørelse.

Stk. 2. Under hensyntagen til den nødvendige expedition i sagen, afgør vedkommende myndighed, om anmodningen i henhold til § 1 imødekommes straks eller senere. Om den, der har indsendt anmodningen, bliver gjort bekendt med dokumenterne således, at han får lov til at se dem på stedet, eller han får afskrift eller fotokopi af disse.

Stk. 3. Landsstyresmanden i lovssager har ret til at fastsætte regler om betaling for afskrift eller for fotokopi.

§ 9. Landsstyresmanden har ret til at bestemme, at oplysninger i de vedkommende dokumenter kan udleveres efter et bestemt tidsforløb uden hensyn til reglerne i denne del.

Kapittul II.
Serligar reglur fyri partar í fyrisitingarmálum.

§ 10. Umsøkjarar, klagarar og aðrir partar í máli, sum almenna fyrisitingin viðgor ella hevur viðgjørt, kunnu krevjast at verða gjørd kunnug við skjølini uttan mun til § 2. Hetta er tó ikki galdandi, um almenn ella privat áhugamál verða mett at hava størri týdning enn tørvurin hjá viðkomandi at gerast kunnug við skjølini fyri at røkja síni áhugamál.

2. stk. Persónur, sum søkir ella hevur søkt starv ella framflyting í almennari tænastu, hevur rætt til uttan mun til § 6, 1. stk. at krevja at verða gjørdur kunnugur við skjøl, sum viðvíkja viðurskiftum hansara.

3. stk. Reglurnar um tagnarskyldu hjá fólki í almennari tænastu avmarka ikki skylduna at lata upplýsingar til partarnar í máli.

4. stk. Hevur tað týdning fyri møguleikarnar hjá persóni at røkja áhugamál síni, at hann fær avrit ella ljósrit av skjølum, skal áheitan hansara játtast.

Kapitel II.
Særlige regler for parter i administrationssprgsmål.

§ 10. Ansøgere, klagere og andre parter i sager, som den offentlige administration behandler eller har behandlet, kan kræves at blive gjort bekendt med dokumenterne uden hensyn til § 2. Dette er dog ikke gældende, såfremt offentlige eller private interesser vurderes af større betydning end vedkommendes behov for at blive bekendtgjort med dokumenterne for at passe sine interesser.

Stk. 2. Personer, der søger om eller har søgt om stilling eller opnormering i offentlig tjeneste, har ret til uden hensyn til § 6, stk. 1, at forlange at blive bekendt med dokumentet, der vedrører hans forhold.

Stk. 3. Reglerne om tavshedspligt for personer i offentlig tjeneste begrænser ikke pligten til at meddele oplysninger til parterne i en sag.

Stk. 4. Har det betydning for mulighederne for en person at fremme sine interesser, at han får afskrift eller fotokopi av dokumenter, skal hans anmodning imødekommes.

§ 11. Setir partur, meðan mál verður viðgjørt fram áheitan um at gerast kunnugur við skjøl, og hendan áheitan skal játtast sambært lógini, verður avgerðin í málinum útsett, til parturin hevur havt møguleika at kunna seg við skjølini.

2. stk. Hetta er tó ikki galdandi, hevur útseting við sær, at farið verður út um lógarásetta freist fyri avgerð fyri fyrisitingini, ella um almenn ella privat áhugamál verða mett at hava størri týdning enn áhugin hjá partinum at útseta avgerð í málinum.

§ 12. Tann, sum er partur í máli, sum er til viðgerðar hjá almennu fyrisitingini, kann, nær tað skal vera, krevja, at avgerð í málinum verður útsett, til hann hevur úttalað seg um málið.

2. stk. Myndugleikarnir kunnu áseta tíðarfreist fyri, nær parturin í seinasta lagi skal hava úttalað seg um málið.

3. stk. Reglurnar í § 11, 2. stk., verða brúktar á sama hátt.

§ 13. Orsakað av serligum umstøðum fer úr gildi § 20 í

§ 11. Fremsætter en part, mens en sag bliver behandlet, anmodning om at blive bekendtgjort med dokumkentet, og denne anmodning skal imødekommes i henhold til loven, skal afgørelsen i sagen udsættes, til parten har haft mulighed for at gøre sig bekendt med dokumenterne.

Stk. 2. Dette er dog ikke gældende, såfremt en udsættelse medfører, at man kommer ud over lovfæstet frist for afgørelse i administrationen eller om offentlige eller private interesser må vurderes at have større betydning end interessen hos parten afgørelsen i sagen bliver udsat.

§ 12. Den, der er part i en sag, som er til behandling i den offentlige administration, kan, når det skal være, forlange, at en beslutning i sagen bliver udsat, indtil han har udtalt sig om sagen.

Stk. 2. Myndighederne kan fastsætte tidsfrister for, hvornår en part senest skal have udtalet sig om sagen.

Stk. 3. Reglerne i § 11, stk. 2, anvendes på samme måde.

§ 13. Begrundet af særlige årsager træder § 20 i lagtingslov

løgtingslóg nr. 102 frá 19. august 1988 um endurnýgging av fiskiskipaflotanum, og loyvt verður til at seta serliga kanning í verk av játtaðum stuðulslánum, lánum og studningum, sum eru játtað eftir hesi lóg.

§ 14. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

nr. 102 af 19. august 1988 om fiskerflådens fornyelse ud af kraft, og der meddeles tilladelse til, at iværksætte en særlig efterforskning af bevilgede støttelån og lån og tilskud, der er bevilget i henhold til denne lov.

§ 14. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Í mai 1987 royndi Føroya Blaðmannafelag at fáa táverandi landsstýri at fáa sett í gildi løgtingslóg um innlit í almenna fyrisiting. Men tað eydnaðist ikki at fáa semju um hetta mál.

Spurningurin um innlit í almenna fyrisiting er framvegis ein týdningarmikil spurningur. Fyrst og fremst tí, at spurningurin, um hvørji skjøl kunnu almannakunngerast, er ógreiður. Harnæst tí, at almennir myndugleikar kunnu freistast at afturhalda týdningarmiklum spurningum, sum almenningurin eigur fullan rætt til at fáa upplýsingar um. Sama er galdandi fyri einstaklingar.

Støðan á hesum øki er í dag so mikið tilvildarlig, at neyðugt er at koma við einum ítøkiligum lógaruppskoti um hesi viðurskifti.

Serstakliga støðan í dag ger, at tað hevur skund at fáa eitt slíkt lógaruppskot samtykt.

Fólk og fjølmiðlar eiga at fáa munandi betri umstøður, tá talan er um innlit í almenna fyrisiting, og tað kunna tey bert fáa við einari slíkari lóg sum hesari.

Vit eru sera fegnir um tað arbeiðið, sum blaðmannafelagið hevur gjørt, og hava tí eisini loyvt okkum at brúka teirra arbeiði sum grundarlag undir hesum lógaruppskotinum.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar:

Øll § 1 merkir, at eisini útlendingar hava rætt til at fáa skjøl útflýggjað.

Lógin ásetir heldur ikki nakað aldursmark. Hetta merkir, at eisini børn undir 15 ár kunnu krevja at fáa skjøl útflýggjað. Tí, sum krevur innlit í skjøl, nýtist ikki at prógva serligan áhuga í málinum. Einasta avmarking er § 1, 2. stk., sum sigur, at tann, sum heitir á fyrisitingina, skal vísa á málið, har skjølini, kravt verður at síggja, noyra til. Vanliga er nóg mikið at vísa á navnið hjá móttakaranum (adressatinum) føðingardag ella annað, sum ger tað møguligt at finna málið (journalina).

Hinvegin er ikki nóg mikið at vísa á okkurt tilvildarligt journalnummar ella dagfesting.

Almenn fyrisiting merkir, at lógin fevnir bæði um mál, sum eru undir tí almenna og um kommunalu myndugleikarnar. Íroknað eru nevndir, ráð og aðrar serligar fyrisitingar hjá hesum myndugleikum, so sum kommunalar havnir, sjónvarp og útvarp.

Lógin fevnir um alt virksemi hjá hesum stovnum, so sum allar avgerðir, tænastur, flytingar og undirvísing. Tó verða gjørd frávik, tá sjúklingur biður um atgongd til sjúkrajournal.

Lógin fevnir heldur ikki um virksemið hjá dómsvaldinum, hvørki tá talan er um lógaravgerðir ella vanligar fyrisetingaravgerðir.

Ivi kann vera um stovnar, sum umsita almenn fyrisitingarmál, men eru stovnaðir á privatrættarligum grundarlagi.

Sambært fyrireikingararbeiðinum til donsku lógina um innlit í almenna fyrisiting, fevnir hon ikki um partafeløg. Uttan mun til, um tað almenna er høvuðspartaeigari ella einasti partaeigari.

Hetta merkir sostatt, at lógin fevnir ikki um virki, sum kommunalur felagsskapur stovnar sum partafelag. Ikki kann sigast greitt, hvar markið er millum almennu og privatu

stovnarnar.

Tó skal nevnast, at almenn tilskot ikki av sær sjálvum gera, at lógin fevnir um stovnin.

Hinvegin kann tað almenna hava so stórt eftirlit við stovninum, at lógin fevnir um hann. Til dømis, tá tað almenna setir sum treyt fyri tilskotið, at tað fær umboð í nevndina. Í slíkum førum kann tað privatrættarliga grundarlagið vera so veikt, at metast má, tað almenna stýrir stovninum.

Í § 2 eru týdningarmestu undantøkini frá § 1. Sambært § 2, 1. stk. skulu persónlig og fíggjarlig viðurskifti hins einstaka ikki upplýsast. § 1 umfatar heldur ikki hjúnabandsmál, faðirskapsmál, læknaváttanir, skattaváttanir, sjálvuppgávur o.s.fr.

Upplýsingar viðvíkjandi tí, nevnt er í § 2, 2. stk., skulu heldur ikki latast almenninginum, tá hetta í teimum ávísu førunum verður mett at hava fíggjarligan týdning fyri hin einstaka ella eitt virki.

Tó skal viðmerkjast, at § 2, 1. stk., nr. 2, ikki krevur so stóra vernd sum persónligu og fíggjarligu viðurskiftini í § 2, 1. stk., nr. 1.

§ 2, 2. stk., vísir á nøkur mál, har rætturin at fáa skjøl útflýggjað í ávísum førum má víkja fyri størri almennum málum.

Týdningarmestu málini sambært 2. stk. eru trygd landsins viðurskifti við aðrar tjóðir ella millumtjóða stovnar, alment eftirlit, stýring og tilrættalegging og verkætlanir um skatt og avgjøld.

Sambært § 2, 2. stk., nr. 4, kann vernd av øðrum áhugamálum haldast duld, tá serlig viðurskifti tala fyri tí.

Í fyrireikingararbeiðinum til donsku lógina verður sagt, at § 2, 2. stk., nr. 4, bara skal brúkast, tá hetta er avgjørt neyðugt, so sum táið talan er um granskingarúrslit ella prógvtøkuuppgávur, áðrenn prógvtøkan hevur verið.

Fevnir § 2 bara um ein part av málinum, skal restin av skjølunum útflýggjast.

§ 3 fevnir um alt skrivligt tilfar, íroknað maka-skjal, sum komið er fram til móttakaran.

Skjøl skulu her tulkast í rúmari merking, ikki einans sum skrivligt tilfar, men eisini sum myndir, tekningar, ljóð-bond, myndabond, tilfar, sum er í teldum, og annað.

Tó má § 3 vikja fyri §§ 2 og 5.

§ 4 sigur, at notatupplýsingar skulu skrivast soleiðis, at almenningurin skal hava høvi at kunna seg við tær.

Fevnir lógin bara um ein part av upplýsingunum, hevur almenna fyrisitingin bara skyldu til at festa hesar upplýsingar á blað.

§ 5 vísir á innanhýsis tilfar hjá almennum fyrisitinginí, sum lógin ikki fevnir um. Eitt nú frásagnir um fundir millum landsstýrismenn og brævaskifti millum landsstýrismenn um lógaspurningar.

Her skal nevnast, at sum heild fevnir lógin um brævaskifti millum landsstýrismenn. Men tað er ikki serliga heppið, at almenningurin fær høvi at kunna seg við skjøl, sum innihalda metingar um framtíðar politiskar avgerðir.

§ 6 sigur, at lógin ikki fevnir um revsimál. Hetta er tí, at rættargangslógin fevnir um hetta økið.

§ 6 fevnir ikki um "disciplinære forfølgelser". Almenningurin hevur tí rætt til atgongd til skjøl í slíkum málum.

Skjøl viðvíkjandi starvssetan og framflyting í starvi skulu ikki útflýggjast.

Tó skulu skjøl viðvíkjandi loysn úr starvi og uppsøgn útflýggjast, um so er § 2 ikki fevnir um tey.

§ 13 vísir til løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum frá 19. august 1988. Mælt verður til, at § 20 fer úr gildi. Sami lógartekstur var í løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum frá 1. juni 1978. Talan var tá um § 19. Skal sleppast fram at eini kanning, hoyring ella

serligari dómsnevnd av stuðulslánum, láni og studningum, so er neyðugt at seta lógargreinina úr gildi.

Á FØROYA LØGTINGI, 22. januar 1990.

Lasse Klein

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 67/1989: Løgtingslóg um innlit í almenna fyrisiting.

Málið er framlagt av Sjálvstýrisflokkinum tann 31. januar 1990 og eftir 1. viðgerð 22. mars beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur til eftirtektar tað, ið ført varð fram frá landsstýrisins síðu um, at landsstýrið arbeiðir við hesum spurningum.

Nevndin tekur ikki undir við fyriliggjandi lógaruppskoti, men er semja um í nevndini í prinsippinum at taka undir við, at skipaðar verða lógarreglur um innlit í almennu fyrisitingina og setir tí fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Vísandi til tær viðmerkingar, ið førdar eru fram frá landsstýrinum undir 1. viðgerð av hesum máli, áleggur løgtingið landsstýrinum at arbeiða víðari við málinum um innlit í almenna fyrisiting og leggja fram lógaruppskot hesum viðvíkjandi í komandi ólavsøkutingsetuni.

RÆTTARNEVNDIN, 25. mai. 1990.

Jógvan Durhuus Marita Petersen John Petersen

Tordur Niclasen Eilif Samuelsen

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURÐS-OG FISKIVINNUFLOKKUR.

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 68/1989: Viðvíkjandi avreiðingarprísi á fiski

U P P S K O T

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at veita trygd fyri at avreiðingarprísirnir galdandi áðrenn 1.februar 1990 ikki lækka.

Viðmerkingar:

Hugstoytt var at frætta, at nevndin fyri Ráfiskagrunnin (eftir áheitan frá landsstýrinum) hevur lýst níggjar avreiðingarprísir galdandi frá 1.februar 1990, til at vera o.lo kr/kg lægri enn galdandi prísir.

Hóast her er bert talan um eina lækking upp á lo oyru/kg so kunnu vit undir ongum umstøðum góðtaka lækkingina, og vilja samstundis vísa á, at vit áður hava víst á tað óneyðuga í, at prísirnir lækka!

Tey seinru árini er ein jøvn lønarhækking farin fram fyri so at siga allar lønmóttakarar her á landi.

Tó hevur ikki so verið fyri útróðrar-og fiskimannin, og kemur tí eisini umtalaða lækking í stóran mun at merkjast sum steinur oman á byrðu hjá hesum, ið baldrast á sjónum og sum í veruleikanum eru teir ið skapa fortreytir fyri at samfelagshjólini í heilatikið mæla.

Fiski-og útróðrarmaðurin er longu frammanundan nóg illa fyri m.a. orsakað tvungnu uppsparingini og øðrum tiltøkum landsstýrsins.

Við bert at vísa vet av vilja hevur landsstýrið innan játtanina til "minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna" 199o møguleika at fyribyrgja umtalaðu lækking.

Hetta kann gerast við at fáýta Ráfiskagrunninum at nýta uml. 3.5 mió. kr. afturat í komandi prísskeiði.

Annars verður víst til teir alment kendu viðmerkingarnar frá Føroya Fiskimannafelag.

Á FØROYA LØGTINGI 31.01.1990

Tórður J. Niclasen

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 68/1989: Viðvíkjandi avreiðingarprísi á fiski.

Málið er framlagt av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 31. januar 1990 og eftir 1. viðgerð 14. februar beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Jógvan Durhuus, Petur Reinert, Suni Jacobsen og Jákup Lamhauge) vísir á uppritið um nýggja fiskivinnupolitikkin og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Henrik Old) kann ikki taka undir við meirilutanum, tá hann vísir til uppritið um fiskivinnuna.

Uppritið sigur í petti 8, 3. stk., at ein prísáseting-arnevnd ásetir ein minstaprís fyri fisk avreiddan í Føroyum, sum verður fyri vánaligan fisk, meðan góð vøra "eigur" at verða keypt fyri hægri pris. Í hesum heldur minnilutin ikki vera nøkur trygd fyri einum rímiligum minstaprísi.

Undir orðaskiftinum um fiskivinnuna er komið fram frá meirilutanum, at ætlanin er at áseta ein minstapris, sum fyri nøkur tiskasløg helst ikki verður hægri enn helvtin av galdandi prísi.

Hugsar ein um tilknýti millum virkir og skip, so er greitt, at tað koma at verða stórar ósemjur millum virkir, reiðarar og manning, og kemur inntøkan hjá fiskimonnum at verða sera skiftandi og ótrygg við umtalaða lága minstaprísi. Tí tekur minnilutin undir við tingmáli nr. 68/1989 viðvíkjandi avreiðingarprísi á fiski og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein annar minnifluti (Törbjørn Poulsen) tekur undir við

málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot Kristiliga fólkaflokksins, Førcya framburðs- og fiskivinnuflokks.

FISKIVINNUNEVNDIN 3. apríl 1990.

Svend Aage Ellefsen Jógvan Durhuus Petur Reinert

Suni Jacobsen Jákup Lamhauge Henrik Old

Tórbjørn Poulsen

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 69/1989: Setan av nevnd at kanna og viðgera arbeiðsloysið.

U p p s k o t

til

samtyktar

A. Nevnd verður sett av løgtinginum við hesum uppgávum:
   1. at kanna, hvussu vorðið er við arbeiðsloysi í Føroyum,
   2. at gera tilmæli um tiltøk at fyribyrgja arbeiðsloysi,
   3. at gera tilmæli um skipan av arbeiðsávising,
   4. at gera tilmæli um skipan av arbeiðsloysisstuðli.

B. Í nevndina, sum telur fimm limir, velja Samskipannarbólkurin hjá arbeiðarafeløgunum, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommuna hvør sín lim, meðan Almannastovan velur fimta limin, sum verður formaður.

C. Nevndin skal hava gjørt álit sítt liðugt áðrenn ólavsøku 1990, og álitið verður lagt fyri tingið á ólavsøku.

Viðmerkingar:

Av tíðindum frá almannastovuni og socialu deild hjá Tórshavnar býráð skilst, at arbeiðsloysi í størri mun er við at taka seg upp í Føroyum.

Í londunum rundan um okkum er skipað arbeiðsávísing, og har er skipað fyri fíggjarligum stuðuli til tey, ið verða rakt av arbeiðsloysi.

Flestu flokkar á Føroya Løgtingi tykjast at hava ta áskoðan at sleppast eigur undan arbeiðsloysisstuðuli, og at rættari er at fyribyrgja arbeiðsloysi.

Hesum er javnaðarflokkurin samdur í, men tað slepst ikki undan, at arbeiðsloysi av og á stingur seg upp við harav fylgjandi tørvi á figgjarligari hjálp.

Ein arbeiðsávísingarskipan vil bæði gera tað lættari hjá fólki at útvega sær arbeiði og vil samstundis vísa møguligt arbeiðsloysi.

Javnaðarflokkurin setir tí fram uppskot til samtyktar um setan av nevnd at taka sær av hesum spurningum, og heldur, at ein nevnd samsett, sum skotið upp er væl egnað at kanna hesi mál og koma við tilmæli.

Á FØROYA LØGTINGI, 31. januar 1990.

Marita Petersen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 69/1989: Setan av nevnd at kanna og viðgera arbeiðsloysið.

Málið er framlagt av Føroya javnaðarflokki tann 31. januar 1990 og eftir 1. viðgerð 14. februar 1990 beint í arbeiðaramálanevndina.

Undir 1. viðgerð kom fram, at tað var breið semja í tinginum um at taka undir við at kanna, hvussu støðan er við arbeiðsloysi í Føroyum og at gera tilmæli um skipan av arbeiðsávísing. Uppskot um at gera tilmæli um fyribyrging av arbeiðsloysi eins og skipan av arbeiðsloysisstuðli varð umrøtt við ymiskum áskoðanum. Heldur ikki vóru flokkar samdir um, hvør ið skuldi umboðast í slíkari nevnd.

Arbeiðaramálanevndin hevur viðgjørt málið og m.a. havt fund við umboð fyri Føroya arbeiðarafelag, Føroya arbeiðsgevarafelag eins og Almannastovuna.

Her kom fram, at Føroya arbeiðarafelag hevur vent sær til øll lokalfeløgini og biðið um talið av arbeiðsleysum. Bæði undir 1. viðgerð av málinum og í nevndini eru ymisk sjónarmið, tá talan er um, hvør ið er arbeiðsleysur. Harumframt eru so fólk, ið eru lutvíst arbeiðsleys, eitt nú útróðrarmenn, ið ikki sleppa út vegna veður, fólk á flakavirkjum, ið av somu grund ikki hava arbeiði hvønn dag, og harumframt smærri vinnurekandi, eitt nú lastbilschaufførar og taxachaufførar. Til tess at fáa hjálp frá Almannastovuni sum arbeiðsleysur krevst, at umsøkjarin hevur roynt eitthvørt arbeiði, har hann býr. Tað merkir, at talan er ikki um, hvørjar fakligar ella arbeiðsligar royndir, umsøkjarin hevur.

Føroya arbeiðsgevarafelag hevur onga skráseting av virkjum, ið eru farin av knóranum, og hvussu nógv fólk arbeiddu har. Arbeiðsgevararnir eru tó varugir við, at alsamt fleiri fólk biðja um arbeiði.

Síðani 1978 er nakað av peningi sett á fíggjarlógina undir heitinum arbeiðsloysisstuðul. Fyri ta tíð fór hesin peningur í sjúkragrunn. Tá sjúkradagpeningsskipanin kom, fór hesin peningur til arbeiðsloysisstuðul. Í fyrstani varð peningurin býttur í millum ávís fekfeløg, men seinni varð hann býttur út upp á øll arbeiðarafeløgini í mun til, hvussu nógvir limir vóru.

Umboð Almannastovunnar greiddi nevndini frá, at stór broyting er hend í talinum á fólki, ið biðja um hjálp eftir § 9 í forsorgarlógini vegna tørvandi vinnu. Seinnu helvt av 1988 lá talið millum 11 og 22 fólk hvønn mánað, ið fingu forsorgarhjálp vegna vinnuleysi. Í seinna helmingi av 1989 lá talið frá 21 í juli mánað til 76 í december. Í 1990 var talið fyri januar og februar ávikavist 84 og 80. Hetta er talið á fólki uttan fyri Havnina. Almannastovan rindar bert til fólk, ið eru skrásett sum A-skattgjaldarar. Tað hægsta, ið fáast kann eftir § 9 í forsorgarlógini er hægsti sjúkradagpeningur, tá skatturin er frádrigin. Almannastovan krevur, at tey fólk, ið søkja hjálp eftir § 9, átaka sær eitt og hvørt arbeiði, sum møguleiki er fyri at fáa. Tað verður hildið, at ein nágreinilig kanning viðvíkjandi talinum av arbeiðsleysum í Føroyum kemur at kosta 2-300.000 kr.

Meginfelag teirra brekaðu hevur vent sær til nevndina og gjørt vart við, at tey ynskja, at tann arbeiðsávísing, sum væntiliga verður sett á stovn, eisini fevnir um brekað fólk.

Síðani hetta mál er framlagt, er semja gjørd í millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum um at gera eitt arbeiðsmarknaðarráð, ið umframt at viðgera spurningin um arbeiðsrætt og útbúgving av arbeiðsfólki eisini skal viðgera spurningin um arbeiðsloysisskipan.

Hin 1. september verður mett um, hvussu arbeiðið gongur, og í seinasta lagi 1. mai 1991 skal skipanin fáa gildi.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jákup Lamhauge, Karin Kjølbro og Eliesar Arge) vísir til hesa semju, har arbeiðsgevara-/og arbeiðstakaraparturin eins og landsstýrið eru umboðað, og setir sostatt einki uppskot fram.

Ein minniluti (Vilhelm Johannesen) vísir á, at í uppskotinum frá javnaðarflokkinum verður mælt til, at løgtingið setir nevnd við hesum arbeiðssetningi:

1. at kanna, hvussu vorðið er við arbeiðsloysi í Føroyum,
2. at gera tilmæli um tiltøk at fyribyrgja arbeiðsloysi,
3. at gera tilmæli um skipan av arbeiðsávísing og
4. at gera tilmæli um skipan av arbeiðsloysisstuðli.

Javnaðarflokkurin mælir til, at nevndin telur fimm limir, at samskipannarbólkurin hjá arbeiðarafeløgunum og Føroya Arbeiðsgevarafelag velja hvør sítt umboð, at Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommuna velja hvør sítt, og at Almannastovan tilnevnir fimta limin, sum verður formaður.

Í sínum áliti leggur meirilutin størsta dentin á punkt 1 og 3. Meirilutin tekur undir við at kanna, hvussu vorðið er við arbeiðsloysi í Føroyum, og at eitt tilmæli verður gjørt um skipan av arbeiðsávising. Meirilutin tekur ikki undir við, at løgtingið setir nevndina, men mælir til, at hendan verður sett av landsstýrinum.

Minnilutin dugur ikki at síggja nakað høpi í hesi støðutøku meirilutans. Verður nevnd sett at kanna arbeiðsloysi, so má hendan - eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum - koma til ta niðurstøðu, at vit hava arbeiðsloysi, og at hetta arbeiðsloysið vindur upp á seg. Tá meirilutin síðani mælir til at skipa arbeiðsávísing, so má ein spyrja, hvat hendan arbeiðsávísing skal gera? Skal hon ávísa arbeiðsleysum arbeiði, sum ikki eru til?

Minnilutin undirstrikar, at tey fýra punktini í uppskoti javnaðarfloksins eru ein heild, og at tað ikki ber til at taka punkt 1 og 3 burturúr, fyri síðani at lata hinar báðar spurningarnar liggja. Punkt 1 og 3 loysa ikki trupulleikarnar. Skulu hesir loysast, mugu punktini 2 og 4 eisini vinna frama.

Undir verandi umstøðum leggur umboð javnaðarfloksins stóran dent á øll fýra punktini. Vit hava arbeiðsloysi og eiga sjálvandi at kanna, hvussu umfatandi hetta arbeiðsloysi er. Í slíkari støðu er tað avgjørt neyðugt at hava eina skipan um arbeiðsloysisstuðul.

Tað er eisini neyðugt at fyribyrgja vaksandi arbeiðsloysi og at seta arbeiði í gongd fyri at fáa tamarhald á støðuni. Í tí sambandinum er tørvur á eini arbeiðsávísing.

Javnaðarflokkurin hevur altið verið av teirri áskoðan,

at almennt virksemi, sum t.d. vega- og bergholsarbeiði, havnabygging og annað eisini, skuldi hava tað endamál at tryggja arbeiði til øll. Við tílíkum almennum arbeiðum hevur tað almenna møguleika fyri at fyribyrgja og avmarka arbeiðsloysi. Men hendan møguleika hevur sitandi samgonga ikki nýtt, tvørturímóti; og hetta er ein orsøk til ta hættisligu støðuna.

At enda vil minnilutin vísa á, at júst í hesum døgum hava løntakarafeløgini yvir fyri landsstýrinum skotið eina arbeiðsloysistryggingarskipan upp, har partarnir á arbeiðsmarknaðinum saman við tí almenna skjóta pening inn í ein arbeiðsloysisgrunn. Hetta talar fyri, at løgtingið eigur at samtykkja uppskot javnaðarfloksins í óbroyttum líki.

Minnilutin mælir til at samtykkja uppskotið.

Eitt annar minniluti (Tórbjørn Poulsen) hevur hesar viðmerkingar til uppskot Javnaðarfloksins at seta nevnd at kanna og viðgera arbeiðsloysið.

Hóast vit eingi beinleiðis tøl hava fyri arbeiðsloysi í Føroyum, so bendir alt á, eitt nú upplýsingar frá fakfeløgunum og frá almannastovuni, at arbeiðsloysi veruliga er her á landi í dag. Tað er líka so greitt, at hetta arbeiðsloysið hevur tikið seg upp seinasta árið og stavar sostatt heilt ella partvíst frá teim tiltøkum, henda samgonga hevur sett í verk.

Tað er tí ikki annað enn rímiligt, so sum Javnaðarflokkurin mælir til, at tingið setir nevnd at kanna og viðgera hetta álvarsama mál.

Minnilutin kann taka undir við uppskoti Javnaðarfloksins so sum tað fyriliggur, við undantak av pkt. A.4., sum leggur upp til nevndina at koma við tilmæli um skipan av arbeiðsloysisstuðli. Minnilutin er av teirri áskoðan, at tað er skylda okkara at skipa so fyri, at vit so vítt gjørligt sleppa undan arbeiðsloysi og tískil ikki hava arbeiðsloysisstuðul fyri neyðini.

ARBEIÐARAMÁLANEVNDIN, 15. mai 1990.

Karin Kjølbro Jákup Lamhauge Eliesar Arge

Vilhelm Johannesen Tórbjørn Poulsen

FØRCYA FRAMBURÐS-OG FISKIVINNIFLOKKUR.

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 70/1989: Kanningar í samband við skeljaveiðu

U P P S K O T

til

s a m t y k t a r

"Álagt verður landsstýrinum ikki at geva loyvi til framhaldandi skeljaveiðu á landgrunninum norðanfyri, fyrr enn nágreinligar kanningar eru gjørdar av árininum tílík veiða við stórum skipi hevur"

Viðmerkingar:

Stór misnøgd hevur tikið seg upp millum útróðrarmenn og ivi um avleiðingarnar av skeljafiskiskapinum norðanfyri.

Í mótmælisskrivi hava útróðrafeløg beinleiðis gjørt vart við síni sjónarmið, har stórt verður fyri avleiðingum hendra veiða kemur at hava á fiskastovnin og gýtingina á umtalaða øki.

Eftir tøgvi stríð eydnaðist tað fyri nøkrum árum síðan at friða gýtingarøki norðanfyri fyri troling , og hava tí eisini útróðrarmenn í dag vælskiljandi ilt við at skilja at umtalaða skeljaveiða verður loyvd.

Tað er vælskiljandi, at skerdu veiðumøguleikarnir hjá skeljabátunum, hevur fingið landsstýrið at giva umtalaða loyvi. MEN kemur henda veiða at skaða og taka grundarlagið undan útróðrinum á nevnda øki - og harvið skerja munandi inntøkumøguleikarnar hjá mangari familju, so kann skjótt talan verða um, at prísurin fyri slíkari veiðu gerst ov høgur, og er tá lítið vunnið.

Á FØROYA LØGTINGI 31.01.1990

Tordur J. Niclasen

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 70/1989: Kanningar í samband við skeljaveiðu.

Málið er framlagt av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 31. januar 1990 og eftir 1. viðgerð 14. februar beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir ein samd nevnd á, at landsstýrið hevur avrátt ikki at geva "Famo" loyvi til framhaldandi veiði, og setir nevndin einki uppskot fram.

FISKIVINNUNEVNDIN, 22. februar 1990.

Svend Aage Ellefsen Suni Jacobsen Petur Reinert

Jákup Lamhauge Jógvan Durhuus Henrik Old

Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

TF. 18000. Telex 81310 tinganu fa. Telefax 14942. Postbox 64
Avgreiðsluskeið: Kl. 10—15, leygardag stongt

31. januar 1990

F. L. j. nr. (at tilskila í svari) 2105-14-2-2

FTS/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 71/1989: Lán til bygging av Tekniskum Skúla í Klaksvík.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um lán til bygging av tekniskum skúla í Klaksvík.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at veita Tekniska Skúlanum í Klaksvík eitt rentu- og avdráttarfrítt lán við upprykkjandi veð í ognini matr. nr. 752^{d}, uppá í mesta lagi 6,5 mió. kr. til liðugtgerð av 2. byggistigi av skúlanum.

§ 2. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at upptaka neyðug lán til veiting av nevnda láni.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om lån til bygning af teknisk skole i Klaksvik.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at yde Tekniska Skúla i Klaksvík et rente- og afdragsfrit lån med oprykkende pant i ejendommen matr. nr., 752^{d} på maksimalt 6,5 mio. kr. til færdiggørelse af 2. etape af skolen.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage nødvendige lån til ydelse av nævnte lån.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 34 frá 16. apríl 1986 um stuðul til bygging av 2. byggistigi av Tekniska skúlanum í Klaksvík hevur landsstýrið heimild at veita Tekniska skúlanum upp til 6,5 mió. kr. í studningi til bygging av 2. byggistigi, og landsstýrið hevur somuleiðis heimild landskassans vegna at taka upp neyðug lán til veiting av nevnda studningi.

Tá varð roknað við, at samlaði byggikostnaðurin fór at vera umleið 19 mió. kr.

Kenslumálaráðið hevði góðkent, at bygging kundi verða framd til teknisku skúlarnar og handilsskúlan í Føroyum fyri upp til 30 mió. kr., tað var fyri upp til 15 mió. kr. í rikisláni, og kenslumálaráðið hevði herumframt biðið føroysku skúlamyndugleikarnar taka avgerð um, hvør bygging skuldi verða framd. Í tann mun samlaði byggikostnaðurin fór upp um 30 mió. kr. skuldu føroysku skúlamyndugleikarnir sostatt yvir fyri ríkismyndugleikunum vátta, at landskassin vildi bera meirkostnaðin.

Eftir hesum fór kostnaðurin av byggingini av 2. byggistigi av Tekniska skúlanum í Klaksvík uppá tilsamans 19 mió. kr. at vera fíggjað soleiðis:

Av kostnaðarrammu kenslumálaráðsins 15 mió. kr.:	
Prioritetslán 1/3 ella	5,0 mió. kr.
Ríkislán 1/2 ella	7,5 mió. kr.
Landskassastudningur 1/6 ella	2,5 mió. kr.
Tilsamans	15,0 mió. kr.
Landskassastudningur svarandi til munin millum samlaða kostnaðin 19 mió. kr. og kostnaðarrammuna 15 mió. kr. ella	4,0 mió. kr.
Tilsamans	19,0 mió. kr.

Samlaði landskassastudningurin fór eftir hesum at verra 6,5 mió. kr.

Kostnaðarmetingin uppá 19 mió. kr. varð gjørd út frá prísum í februar 1986, sum vórðu framroknaðir 2 ár til februar 1988. Í metingini varð tó ikki tikin við kostnaðurin av innbúgvi, vetrarbyggifyriskipanum, óvæntaðum útreiðslum og figging.

Mett verður nú, at samlaði kostnaðurin, heruppií nevndi kostnaður av innbúgvi o.ø., fer at vera 25,5 mió. kr. og hesin samlaði kostnaðurin verður at figgja soleiðis:

Av kostnaðarrammu kenslumálaráðsins 15 mió. kr.:	
Prioritetslán 1/3 ella	5,0 mió. kr.
Ríkislán 1/2 ella	7,5 mió. kr.
Landskassastudningur 1/6 ella	2,5 mió. kr.
Tilsamans	15,0 mió. kr.
Landskassastudningur svarandi til munin millum samlaða kostnaðin 25,5 mió. kr. og kostnaðarrammuna 15 mió. kr. ella	10,5 mió. kr.
Tilsamans	25,0 mió. kr.

Samlaði landskassastudningurin verður eftir hesum 13,0 mió. kr., og sum frammanfyri tilskilað hevur landsstýrið í løgtingslóg nr. 34/1986 heimild at rinda studning upp til 6,5 mió. kr.

Landsstýrið leggur sostatt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um, at landsstýrinum verður heimilað at rinda Tekniska skúlanum í Klaksvík upp til 6,5 mió. kr. í rentu- og avdráttarfríum láni til liðugtgerð av 2. byggistigi av hesum skúla.

Signar Hansen
landsstýrismaður

/

Eyðfinnur Jacobsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 71/1989: Lán til bygging av Tekniska skúla í Klaksvík.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 31. januar 1990 og eftir 1. viðgerð tann 22. februar beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur havt fund við avvarðandi landsstýrismann og við landsskúlafyrisitingina og fingið frágreiðing um hvussu meirkostnaðurin kemur fram og er viðlagt skjal hesum viðvíkjandi.

Fíggjarnevndin átalar enn einaferð at almenn bygging ikki verður hildin innanfyri játtaðar karmar og áleggur landsstýrinum at tryggja at slíkt ikki endurtekur seg.

Samsvar má verða millum játtan og nýtslu og verður í hesum sambandi víst til fíggjarnevndarálitið í løgtingsmáli nr. 12/1989: Løgingslóg um figging av hølum til Tolleftirlitið.

Út frá ti at byggingin er framd og peningurin nýttur, tekur ein samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins.
+ skjal.

FÍGGJARNEVNDIN, tann 21. mai 1990

Anfinn Kallsberg	Flemming Mikkelsen	Heine O. Heinesen
Eilif Samuelsen	Jørgen Thomsen	Jógvan Durhuus
	Tordur Niclasen	

Fl.ir.nr. 2105-14-2-3

Samanstilling av byggirekningi fyri Teknisku Skóla í Klaksvík, 2 byggistig

		Febr. 1986 Disp. uppskot	28 okt. 1986 Projektuppskot	10 sept. 1987 Útbjóðing	9 apríl 1990 Avhending	Meirkostn. tils.
1	Jørðarbeiði	1.050.000	1.027.000	694.675	850.070	-199.930
2	Betongarbeiði	1.250.000	2.419.103	3.898.155	4.128.404	2.878.404
3	Betongeiningar		254.400	450.000	611.798	611.798
4	Stálarbeiði	946.000	1.068.480	1.649.229	1.817.705	871.705
5	Tiegur og takarbeiði	5.377.000	4.423.400	4.165.358	4.452.485	-924.515
6	Snikkarvarnir	752.000	912.000	1.046.327	1.332.367	580.367
7	Múrararbeiði	461.000		205.415	273.112	-187.888
8	Málarararbeiði og gólvleggjing	400.000	859.400	857.264	872.562	472.562
9	Hiti, Vatn og Sanitet	1.922.000	2.155.000	2.000.000	1.347.542	-574.458
10	Ventilatión			1.500.000	885.574	885.574
11	El arbeiði	1.455.000	1.650.000	2.054.154	2.416.896	961.896
12	P-ykið	563.000	603.000		500.000	-63.000
13	Øventaðar útreiðslur		400.000	457.000	1.053.705	1.053.705
14	Vesar broytingar og eykaarb.			310.623	0	0
15	Ferstandi arbeiðir				300.000	300.000
16	Projektering og fakeftirlit	2.253.300	2.400.000	2.352.060	2.374.247	121.247
17	Byggiváðsla		50.000	70.000	533.509	533.509
18	Frent	130.000	130.000	130.000	181.151	51.151
19	Innbúgv				298.406	298.406
20	Flyting				235.475	235.475
21	Ymiskt	126.000	255.000	150.000	210.315	84.315
	Byggikostnaður	16.685.000	18.606.700	21.940.770	24.675.325	7.990.325
	Pris- og lønarhækkingar	2.164.129	2.208.080	1.170.722	0	-2.164.129
	Saml. byggikostnaður	18.849.129	20.814.980	23.111.492	24.675.325	5.826.197
22	Rentur, kurstap o.t.				1.081.645	
23	Rentuinntøkur				-662.228	
24	Ogoldnar rokningar sum óseoja er um				700.000	
	Útreiðslur alt				25.794.742	

Viðmerkingar:

Ætlan er ikki at keypa innbúgv, játtan 19 mió.kr.

Víðkan við innskotnari hædd, 290 m2, góðkent.

Tilboð dýrari enn ætt. Ventilatión aftur at og p-ykið-út.


Nytt innbúgv og flyting, íroknað pris-hækkingar.

Pris- og lønarhækkingar. Eykaarbeiði og øventaðar útr.

Meirjáttan: kr. 25.794.742 - kr. 19.000.000 = kr. 6.794.742


Landsskrivstovan 17.05.90


RED: 10 X




Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22





RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22

LØGTINGS-TIDINDI

1989

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 31. januar 1990

Tlf. 11080 . Telex 81310 fmgpst fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt
FTS/or

F. L. j. nr. 2128-6
(at tilskila í svari)

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 72/1989: Lán til bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um lán til bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at veita Føroya Handilsskúla eitt rentu- og avdráttarfrítt lán við upprykkjandi veð í ognini, matr. nr. 871^{h}, uppá í mesta lagi 5,3 mió. kr. til liðugtgerð av skúlanum.

§ 2. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at upptaka neyðug lán til veiting av nevnda láni.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om lån til bygning af afdeling af Færøernes Handelsskole i Kambsdalur.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at yde Føroya Handilsskúla et rente- og afdragsfrit lån med oprykkende pant i ejendommen matr. nr. 871^{h}, på maksimalt 5,3 mio. kr. til færdiggørelse af skolen.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage nødvendige lån til ydelse af nævnte lån.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Við skrivi dagfest 27. februar 1986 hevur landsskúlafyrisitingin sent landsstýrinum eina kostnaðarmeting viðvíkjandi bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali uppá umleið 25,3 mió. kr. við tilmæli um, at landsstýrið útvegar tann pening til byggingina, sum ikki verður útvegaður við prioritetsláni og ríkisláni.

Landsskúlaráðið hevur einmælt góðkent hetta byggimálið.

Bygging av tekniskum skúlum og handilsskúla hevur verið fíggjað við 1/3 í prioritetsláni, 1/2 í ríkisláni og 1/6 í eginpeningi, og landsstýrið hevur við heimild í serligari løgtingslóg rindað hesum skúlum studning svarandi til eginpeningin ella tann partin av eginpeninginum, sum skúlin sjálvur hevur ikki havt tøkan.

Kenslumálaráðið hevur góðkent, at bygging kann verða framd til teknisku skúlarnar og handilsskúlan í Føroyum fyri upp til 30 mió. kr. í árunum 1985 - 1987, tað er fyri upp til 15 mió. kr. í ríkisláni, og kenslumálaráðið hevur herumframt biðið føroysku skúlamyndugleikarnar taka avgerð um, hvør bygging skal verða framd. Í tann mun samlaí byggikostnaðurin fer upp um 30 mió. kr., mugu føroysku skúlamyndugleikarnir sostatt yvirfyri ríkismyndugleikunum vátta, at landskassin ber meirkostnaðin.

Eftir hesum verður kostnaðurin av byggingini av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali uppá tilsamans 25,3 mió. kr. at fíggja soleiðis:

Av kostnaðarramma kenslumálaráðsins 15 mió. kr.:	
Prioritetslán 1/3 ella	5,0 mió. kr.
Ríkislán 1/2 ella	7,5 mió. kr.
Landskassastudningur 1/6 ella	2,5 mió. kr.
Tilsamans	15,0 mió. kr.

Landskassastudningur svarandi til munin millum samlaða kostnaðin 25,3 mió. kr. og kostnaðarrammuna 15 mió. kr. ella ..... 10,3 mió. kr.
Tilsamans ..... 25,3 mió. kr.

Landsstýrið leggur sostatt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um, at landsstýrinum verður heimilað at rinda Føroya Handilsskúla upp til 5,3 mió. kr. í rentu- og avdráttarfríum láni til liðugtgerð av deildini á Kambsdali.

Signar Hansen
landsstýrismaður

/ Eyðfinnur Jacobsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080 . Telex 81310 lingva fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Argreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

februar 1990

F. L. j. nr. (at tilskila í svari) 2371-2

FTS/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 73/1989: Broyting í løgtingslóg um útbúgvingarstuðul.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útbúgvingarstuðul.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om uddannelsesstøtte.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 109 frá 15. september 1988 um útbúgvingarstuðul verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Í stuðulsárinum 1989/90 kann tann, ið er í útbúgving í mesta lagi fáa fylgjandi lestrarstuðul:

Heimabúgvandi undir 18 ár	7.641 kr.
Heimabúgvandi yvir 18 ár	18.146 kr.
Útibúgvandi undir 18 ár	17.191 kr.
Útibúgvandi	

§ 1.

I lagtingslov nr. 109 af 15. september 1988 om uddannelsesstøtte foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 1 affattes således:

"I støtteåret 1989/90 kan den uddannelsessøgende højst få følgende beløb i stipendium:

Hjemmeboende under 18 år	7.641 kr.
Hjemmeboende over 18 år	18.146 kr.
Udeboende under 18 år	17.191 kr.
Udeboende	

yvir 18 ár 27.696 kr.
Í stuðulsárinum 1990/91 og seinni stuðulsár kann tann, ið er í útbúgving í mesta lagi fáa fylgjandi lestrarstuðul:
Heimabúgvandi
undir 18 ár 7.303 kr.
Heimabúgvandi
yvir 18 ár 17.343 kr.
Útibúgvandi
undir 18 ár 16.430 kr.
Útibúgvandi
yvir 18 ár 26.471 kr."

2) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Tann, ið er í útbúgving, og sum er 18 ár og eldri, kann í stuðulsárinum 1990/91 og seinni stuðulsár fáa lestrarlán úr landskassanum upp til 13.692 kr."

3) § 3 verður strikað.

4) Sum nýtt stk. 3 í § 4 verður sett:
"Stuðulsstovnurin kann áseta nærri reglur fyri at veita stuðul, tá talan er um norðurlendskt, europeiskt ella alheims lestrarsamarbeiði av tílíkum slagi, sum ERASMUS og Nordplus skipanirnar."

5) § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Endaligt veitt lestrarlán samb. § 6, stk. 1 verður

over 18 år 27.696 kr.
I støtteåret 1990/91 og senere støtteår kan den uddannelsessøgende højst få følgende beløb i stipendium:
Hjemmeboende
under 18 år 7.303 kr.
Hjemmeboende
over 18 år 17.343 kr.
Udeboende
under 18 år 16.430 kr.
Udeboende
over 18 år 26.471 kr."

2) § 2, stk. 2, affattes således:
"Den uddannelsessøgende, der er fyldt 18 år eller ældre, kan i støtteåret 1990/91 og senere støtteår få et studielån fra landskassen på højst 13.692 kr."

3) § 3 ophæves.

4) Som nyt § 4, stk. 3 indsættes:
"Stipendiekontoret kan fastsætte nærmere regler for ydelser af stipendier i forbindelse med nordisk, europæisk eller internationalt uddannelsessamarbejde, så som ERASMUS og NORDPLUS ordningerne.

5) § 7, stk. 1 affattes således:
"Endeligt tildelt studielån i medfør af § 6, stk. 1 forrentes i uddannelses-

frá og við 1. august 1990 at renta í útbúgvingartíðini við eini árligari rentu, sum er 4%. Síðani rentar upphæddin eftir lokna útbúgving við 1% omanfyri ta til eina og hvørja tíð galdandi diskonto."

tiden med en årlig rente på 4%. Derefter forrentes beløbet efter endt uddannelsestid med en årlig rente på 1% over den til enhver tid gældende diskonto.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse..

Viðmerkingar:

Á fíggjarløgtingslógini fyri 1990 eru settar 40 mió. kr. av til útbúgvingarstuðul og ískoyti til útisetar. Skulu stuðulsútgjaldingarnar fyri 1990 haldast innanfyri hesar karmar, mugu broytingar gerast í lógini beinanvegin.

Ískoyti til útisetar í 1989/90 kemur væntandi at kosta 8 mió. kr. Sostatt eru 32 mió. kr. til ta lógarfestu ÚS-skipanina.

Í august '89 steðgaði landsstýrið stuðlinum til 10. flokk. Við hesi skerjing vórðu góðar 4,5 mió. kr. spardar á ÚS-skipanini. Hetta merkir, at áðrenn tær skerjingarnar, sum nú standa fyri durum, eru longu 4,5 mió. kr. tiknar av skipanini.

Heldur skipanin fram óbroytt, sæst í talvu 1 og 2 í viðlagda skjali 1, hvussu stórur stuðulin verður í lestrarárinum 1990/91 við hesum fortreytum:

1) Vanligi vøksturin í lánum 2%/ár.

2) Býtið heimabúgvandi/útibúgvandi er í 1990 tað sama sum í

tíðarskeiðinum august - desember 1989.

3) Aldursbýtið og aldursspreiðingin er óbroytt í 1990/91.

4) Orsakað av útlitinum fyri skerdum arbeiðsmøguleikum saman við einari vanligari tilgongd metir Stuðulsstovnurin, at talið á umsøkjarum næsta lestrarár veksur við 2%.

5) Prístalshækkingin fyri lestrarárið 1990/91 er góð 8% í mun til lestrarárið 1989/90. Henda regulering verður framd sambært § 3 í ÚS-lógini og verður roknað út sum prístalshækkingin frá 1. januar 1989 til 1. januar 1990.

6) Talið á persónum undir ÚS-skipanini pr. 01.02.1990 er 1.360.

Landsstýrið hevur rættiliga gjølla kannað, hvussu tær neyðugu skerjingarnar kunnu gerast, so tær fáa minst møguligar avleiðingar fyri tey útibúgvandi, og er komið fram á, at hesar broytingar eru neyðugar:

- Studningsupphæddirnar í § 2, stk. 1 í lógini verða skerdar.
- Lániupphæddin í § 2, stk. 2 í lógini verður skerd.
- Prístalið í § 3 í lógini verður sett úr gildi.
- Rentur verða lagdar á lán í útbúgvingartíðini, hetta at rokna frá 01.08.1990.

Mælt verður til broytingarnar við hesum fortreytum:

1) Av tí at fleiri fara at aftra seg at taka lán verður mett, at lántøkan fellur við 4% í 1990.

   Av praktiskum orsøkum er tað rættast ikki at broyta lánini fyrr enn 1. august; tí verður úrslitið av tiltakinum í 1990 bert 5/12.

2) - 4) Tær somu sum omanfyri.

Skulu sparast 10,0% í studnings- og lánspartinum, tá er prístals-viðgerðin ikki tald við.

Á talvu 7 í skjali 2 eru útroknингarnar vístar. Á talvu 8 í skjali 2 eru stuðulsupphæddirnar til § 2, stk. 1 útroknaðar.

Viðmerkjast kann, at effektin av at leggja rentur á lán í útbúgvingartíðini verður meir enn tvífaldað í 1991.

Viðvíkjandi § 4, stk. 1 er at siga, at verandi orðingin í lógartekstinum forðar fyri, at avtalur kunnu gerast innanfyri skipanir sum NORDPLUS og ERASMUS. Hetta tí fólk undir ÚS-skipanini ikki framhaldandi kunnu fáa stuðul, um tey fara av landinum at nema ein part av útbúgvingini.

Landsstýrið heldur, at føroyingar eiga at fáa høvi til í eitt tíðarskeið og sum liður í útbúgvingini í Føroyum at taka ein part av útbúgvingini í einum øðrum landi, og mælir tí til, at Stuðulsstovnurin kann áseta nærri reglur fyri at veita stuðul, tá talan er um norðurlendskt, europeiskt ella alheimslestrarsam-starv av slíkum slagi sum ERASMUS og NORDPLUS.

Í fylgiskjali 3 sæst, hvussu stuðulsskipanirnar eru í Føroyum, Danmark og Noregi.

Signar Hansen
landsstýrismaður

/Eyðfinnur Jacobsen

Skjal 1

ÚTROKNINGAR Í SAMBAND VIÐ SPARITILTØK Á ÚS-SKIPANINI:

(Um aðrar møguleikar enn teir her vistu verður vist til álit frá august 89)

Status quo:

Talva 1: Útroknaðar totalupphæddir fyri ÚS skipanina fíggjarárið 90

	Stuðul fyri Tíðarskeiðið. 1.8.89-31.07.90	Roknaður stuðul/ mánaða í 90	Framroknað fyri fíggjar-árið 90
Studningur	14.534.845	2.422.474	30.248.974
Lán	3.043.100	507.183	6.459.764
Stuðul	17.577.945	2.929.658	36.708.737

Fortreytir:

Lántøkan veksur við í árinum 90 í %	2,00
Býtið heima/útibúgvandi:	Konstant
Vøkstur í tilgongd lestrarárið 90/91 í %	2,00
Prístalsviðgerð =	1,08
Persónar undir ÚS-skipanini 1/2-90	1.360

Talva 2: Útroknaðar stuðulsupphæddir

	Upphæddir lestrarárið 89/90*)	Upphæddir/ mánaða 89/90	Upphæddir Lestrarárið 90/91*)	Upphæddir/ mánaða 90/91
Studningur**):				
HB und. 18 ár	8.114	676	8.729	727
HB yvir 18 ár	19.270	1.606	20.732	1.728
ÚB und. 18 ár	18.256	1.521	19.641	1.637
ÚB yvir 18 ár	29.412	2.451	31.643	2.637
Lán	15.213	1.268	16.367	1.364

Viðm. *) Prístalsviðgjørdar upphæddir lestrarárið 89/90 og 90/91 smb. §3 í ÚS-lógini
**) HB = heimabúgvandi
**) ÚB = útibúgvandi

Skjal 2

"SKERJING III"

Skerjing í studningi og láni
Eingin pristalsviðgerð
Rentur verða lagdar á lán í útbúgvingartiðini

Talva 7: Útroknaðar totalupphæddir fyri ÚS skipanina figgjarárið 90

	Stuðul fyri Tíðarskeiðið 1.8.89-31.02.90	Roknaður stuðul/ mánaða í 90	Framroknað fyri figgjar-árið 90
Studningur	14.534.845	2.180.227	26.380.744
Lán	3.043.100	456.465	5.643.125
Stuðul	17.577.945	2.636.692	32.023.868

SKERJINGÍ STUDNINGI Í %	10
SKERJING Í LÁNI Í %	10
(skerjingin í lánunum fer ikki fram fyrr enn aftana 01.08.90)	

Fortreytir:

Lántøkan veksur við í árinum 90 í %	-4,00
Býtið heima/útibúgvandi:	Konstant
Vøkstur í tilgongd lestrarárið 90/91 í %	2,00
Pristalsviðgerð:	0,00
Persónar undir ÚS-skipanini 1/1-90	1.360

Talva 8: Útroknaðar stuðulsupphæddir

	Upphæddir lestrarárið 89/90*)	Upphæddir/ mánaða eftir sparing	Upphæddir/ Lestrarárið 89/90	Upphæddir lestrarárið 90/91
Studningur:				
HB und. 18 ár	8114	609	7641	7303
HB yvir 18 ár	19270	1445	18146	17343
ÚB und. 18 ár	18256	1369	17191	16430
ÚB yvir 18 ár	29412	2206	27696	26471
Lán***)	15213	1141	15213	13692

Viðm.

*) Pristalsviðgjørdar upphæddir lestrarárið 89/90 smb. §3 í ÚS-lógini
**) HB = heimabúgvandi
**) ÚB = útibúgvandi
***) Lánsupphæddin/mánaða fyri 90 fær ikki gildi fyrr enn eftir 01.08.90
- fram til 01.08.90 er upphæddin óbroytt

Skjal 3

Galdandi stuðulsskipanir í Føroyum, Danmark og Noreg.

1.1.1 Stuðulsskipanin í Føroyum (Ú.S):

A: Aldursmark:

Í tí føroysku skipanini er einki aldursmark fyri at stuðul kann veitast.

B: Stuðulsupphæddir:

Satsirnir fyri 89/90 eru vístir í talvu I.

Talva I: ÚS-stuðulsupphæddir 89/90:

	Studningur	Lán	=Stuðul
undir 18 ár:			
Heimabúgvandi	8.114	0	8.114
Búgvandi hjá øðrum	18.256	0	18.256
yvir 18 ár:			
Heimabúgvandi	19.270	15.213	34.483
Búgvandi hjá øðrum	29.412	15.213	44.625

Viðm: stuðul = studningur + lán

C: Inntøkuviðurskiftini hjá umsøkjaranum:

Umsøkjarin undir Ú.S.-skipanini kann vinna eina ávísmarkaða peningaupphædd, uttan at stuðulin verður skerdur. Tað sama ger seg galdandi, tá talan er um ognarviðurskifti.

D: Inntøkuviðurskifti hjá foreldrum:

Foreldrainntøkuviðurskiftini hjá Ú.S.-umsøkjarum hava onga ávirkan á stuðulsveitingarnar.

E: Rentur av lestrarláni:

Lestrarlánið er rentufrítt undir útbúgvingartíðini. Eftir loknan lestur rentar lánið við 1% omanfyri diskontoina.

1.1.2 Stuðulsskipanin í Danmark (SU):

A: Aldursmark:

Aldursmarkið fyri at fáa stuðul frá Statens Uddannelsesstøtte er, at umsøkjarin skal vera fyltur 18 ár.

B: Stuðulsupphæddir:

Satsirnir fyri 89/90 í í tí donsku stuðulsskipanini eru vístir í talvu II.

Talva II: SU-stuðulsupphæddir 89/90:

	Studningur	Lán	Stuðul
Heimabúgvandi	22.000	16.000	38.000
Búgvandi hjá øðrum	36.000	16.000	52.000

Viðm: Stuðul = studningur + lán

C: Inntøkuviðurskiftini hjá umsøkjaranum:

Inntøka:
Hann ið er undir SU-skipanini kann vinna upp til kr. 34.000 uttan, at stuðulin verður skerdur. Er inntøkan yvir hettar hámarkið, verður studningurin skerdur tilsvarandi og lánið skert 50% av tilsvarandi virði.

Ogn:
Stuðulin er eisini treytaður av nettoognarviðurskiftunum hjá umsøkjaranum. Av allari nettoogn yvir 100.000 kr. verða 75% roknað sum vanlig inntøka.

D: Foreldrainntøka (hjá umsøkjarum, sum eru undir 19 ár):

Hjá umsøkjarum, sum eru undir 19 ár, verða eisini inntøkuviðurskiftini hjá foreldrunum avgerandi fyri útrokningina av stuðlinum.
Fyri at fáa fullan stuðul, skal foreldrainntøkan vera minni enn 167.700 kr. Umsøkjarin fær engan stuðul um foreldrainntøkan er yvir 274.700.
Um umsøkjarin hevur systkin undir 18 ár, verða 17.800 kr. frátrektar í foreldrainntøkuni/barn.

E: Rentur av lestrarláni:

Lestrarlánið rentar við 4% í útbúgvingartíðini.

1.2.1 Útbúgvingarstuðulsskipanin í Noreg:

Upphæddirnar eru uppgivnar í norskum krónum. Kursurin var 06.07.89 kr. 1.05

A: Aldursmark:

Í tí norsku skipanini verður útrokningin av stuðli til allar umsøkjarar undir 19 ár treytað á foreldrainntøkuna. Tvs. at norðmenn ikki hava nakað aldursmark fyri at stuðul kann veitast.

B: Stuðul:

Í tí føroysku og donsku stuðulslóggávuni er láns/studningslutfallið fastur partur av samlaða stuðlinum. Hetta er øðrvísi í tí norsku skipanini. Norðmenn arbeiða ístaðin við einari stuðulsupphædd, har studningurin verður roknaður eftir nærri reglum.

Satsirnir í tí norsku skipanini fyri stuðulsárið 89/90 eru vístir í talvu III.

Talva III: Stuðulssatsir í tí norsku stuðulsskipanini:

	undir 19 ár	yvir 19 ár
Heimabúgvandi	29.100	34.500
Útibúgvandi	44.400	49.800

Viðm.: Upphæddirnar eru roknaðar út frá hægri lestri. Er talan um ungdómsútbúgvingar, lækkað allar upphæddirnar við 1.900 kr.

Treytað av, at hvørki foreldrainntøku ella umsøkjarainntøkuviðurskifti hava nakra ávirkan á útrokningina av stuðlinum, verður býtið millum studning og lán sum víst er í talvu IV.

Talva IV: Býtið millum studning og lán undir nærri treytum:

Bústaðarviðursk-	undir 19 ár		yvir 19 ár	
	lán	studningur	lán	studningur
Heimabúgvandi	29.100	0	34.500	0
Útibúgvandi	40.400	4000	43.300	6.500

Viðmerking: Studningurin er útroknaður soleiðis:
(35.800 - stuðul talva III)*0,47

C: Inntøkuviðurskiftini hjá umsøkjaranum:

Inntøka:
Umsøkjarin kann vinna kr. 30.000, uttan at hetta ávirkar stuðulin. Av allari inntøku hægri enn 30.000 kr., verða 60% frátrekt í stuðlinum.
Er talan um inntøku t.d. inntøku av fastari ogn, sum ikki beinleiðis er vunnin í samband við arbeiði, verða 60% trekt frá í stuðlinum.

Ogn:
Stuðulin er eisini treytaður av ognarviðurskiftunum hjá umsøkjaranum. Av allari ogn yvir 120.000 verða 20% trektar frá í stuðlinum.

D: Foreldrainntøka (til umsøkjarar, sum eru undir 19 ár):

Hjá umsøkjarum, sum eru undir 19 ár, verða eisini inntøkuviðurskiftini hjá foreldrunum avgerandi fyri útrokningina av stuðlinum.

Fyri at fáa fullan stuðul, skal foreldrainntøkan vera minni ennn 100.000 kr. Umsøkjarin fær ongan stuðul, um foreldrainntøkan er hægri enn 214.000.

Um umsøkjarin hevur systkin undir 19 ár, verða 4.000 kr. frátrektar í foreldrainntøkuni fyri hvørt. Tvs. at foreldrainntøkumarkið lækkar við 4.000 kr/barn.

E. Rentur av lestrarláni:

Lestrarlánið rentar ikki í útbúgvingartíðini. Eftir loknan lestur rentar lánið við 11,5%.

Løgtingsmáli nr. 73/1989: Broyting í løgtingslóg um útbúgvingarstuðul.

Landsstýrið legði málið fram 14. februar 1990 og eftir 1. viðgerð 22. februar varð tað beint í mentannar- og skúlanevndina.

Á fíggjarløgtingslógini fyri 1990 eru settar av til grunnin til útbúgving 40,2 mió. kr.

Uppskotið snýr seg um at gera broytingar í verandi lóg soleiðis, at ávsetti peningurin fer at røkka til tær lógarásettu veitingarnar.

Ávísar skerjingar verða framdar í upphæddunum til studning og til lán. Lánini verða nú rentað við 4% í útbúgvingartíðini, og eftir lokna útbúgving við 1% ovanfyri tá til eina og hvørja tíð galdandi diskonto. Prístalsviðgerðin í § 3 í lógini verður sett úr gildi.

Broyting verður gjørd í § 4 soleiðis, at nú kunnu avtalur gerast innan fyri skipanir, so NORDPLUS og ERASMUS og fólk undir útbúgvingarskipanini framhaldandi kunnu fáa stuðul, um tey fara av landinum at taka ein part av útbúgvingini.

Skriv er komið til Føroya løgting frá Studulsbólkinum hjá LFÚ, sum sigur seg hava virkað fyri at verja útbúgvingarstuðulin hjá teimum lesandi og sær seg noyddan upp á tað harðasta at mótmæla broytingaruppskotinum frá Føroya landsstýri.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt eg í ein meirluta og tveir minnilutar.

Meirlutin (Eilif Samuelsen, Hergeir Nielsen og Jógvan á Lakjuni) hevur tá áskoðan, at neyðugt er undir verandi búskaparligu støðuni at fremja hesa lógarbroyting og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minnilutin (Jógvan Adolf Johannesen) tekur ikki undir við uppskotinum og teimum skerjingum, sum talan er um.

Tað er ein sannroynd, at føroyski parturin av næminga-stuðlinum er so lítil, at har als einki er at skerja burturav.

Um so er, at landskassin yvirhøvur skal lata okkara lesandi ungdómi stuðul, kann hann als ikki vera minni enn hann er í løtuni.

Sannlekin er jú hann at danir gjalda um 80% av lestrar-stuðlinum og landskassin restina.

Hetta vekur hugsannarsemi, og ein skuldi ikki trúð, at samgongan kondi sær at koma við uppskoti um at skarva burtur av so lítlum.

Tí hetta, at føroyski parturin í skúlaverkinum støðugt minkar samanborið við hin danska, er júst tað øvugta av tí, sum uppfatanin av at standa á egnum beinum skuldi verið.

Annars heldur javnarðarflokkurin eisini, at uppskotið eisini er illa umhugsað, um ætlanin er at okkara ungdómur skal lesa her í Føroyum.

Hin vegin ber uppskotið á tað borðið, at ungdómurin, í staðin for til Danmarkar, har umstøðurnar at lesa eru munandi betri enn her, tí har er stuðulin hægri.

Eisini er ivasamt um hesin ungdómur kemur aftur.

Annars vísir javnarðaflokkurin á sítt egna uppskot til fíggjarlóg 1990, har skotið varð upp at játta 5 mió. kr. afturat tí, sum landsstýrið hevði skotið upp at seta av til endamálið.

Um hetta uppskot javnaðarfloksins hevði verið samtykt var ikki neyðugt at koma við uppskoti um skerjing, sum nú er til viðgerðar.

Minnilutin tekur tí ikki undir í at skerja lestrarstuðulin.

Ein annar minniluti (Lasse Klein) førir fram, at hann heldur tað vera sera løgið, at landsstýrið letur føroyska partin av stuðulinum minka, meðan tann danski parturin av blokkinum veksur, serstaklíga tá vit hugsa um, at tað er tjóðveldisflokkurin, sum umsitur hetta málsøkið í Tinganesi. Sami flokkur, sum rópar upp um loysing og kvetting, men tá saman um kemur, ynskir størri og størri samband við danir.

Tann danski parturin er í dag upp á umleið 25 mió. kr.,

meðan føroyski parturin er umi. 15,2 mió. kr., ella 10 mió. kr. minni.

Skerjingarnar hjá teim lesandi eru heilt burtur við, og samgongan birtir uppundir, at tað við hesum uppskotinum betri skal loysa seg at missa skúlaungdóm okkara av landinum, heldur enn at varðveita hann í okkara egna umhvørvi.

Uppskotið førir við sær, at sjálvt hjá næmingum í 10. flokki fyri ikki at tala um studenta- og HF-útbúgvingina og tey, sum fara at lesa á lærdum háskúla, at tað fíggjarliga loysir seg betur at fara til Danmarkar at lesa.

Eftir uppskoti landsstýrisins verður útbúgvingarstuðulin minkaður í 1989/90 við 4,5%, og í 1990/91 minkar stuðulin við 8,7%.

Sum steinur oman á byrðu, skal nú renta roknast av útbúgvingarlánunum í útbúgvingartíðini.

Minnilutin mótmælir harðliga slíka harðrenda herferð móti teim, sum hava sett sær fyri at fara undir eina útbúgving av einum og hvørjum slagi, og harmast um, at samgongan heldur fram at revsa tey, sum eru ringast fyri fíggjarliga.

Øll tiltøk íroknað verður hvør næmingur skorin niður við omanfyri 16% í lestarárinum 1990/91.

Fíggjarliga støðið hjá lesandi í Føroyum verður fullkomiliga tikið undan teimum, eins og gjørt er á øðrum økjum. Her verður serstakliga hugsað um skattahámarkið, bundnu tvungnu uppsparingina, tollhækkingarnar, pristalsviðgerðina av lønum, barnapeningin o.s.fr.

Samgongan tykist ikki at gevast, fyrr enn alt okkara samfelag er farið í knús, og at tey ríku skulu gerast ríkari, og at munurin millum rík og fátæk gerst størri og størri.

Minnilutin tekur undir ongum umstøðum undir við uppskoti landsstýrisins og ávarar samgongina um at samtykkja uppskotið.

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 7. mars 1990.

Eilif Samuelsen Hergeir Nielsen Jógvan á Lakjuni

Jógvan Adolf Johannesen Lasse Klein

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11080 . Telex 81310 tingms fa . TeleTax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. leygardag stongt

14. februar 1990

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari)

1541-1-1

KjH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 74/1989: Løgtingslóg um fiskivinnuráð.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um Fiskvinnuráð.

§ 1. Eftir tilmæli frá vinnuni tilnevnir landsstýrið Fiskivinnuráð við umboðum fyri fiskivinnuna. Í ráðnum skulu vera hesi umboð:

Fiskasølufeløgini Føroya	1 umboð
Ráfiskak eyparafelag Føroya	1 umboð
Reiðarafelag Føroya	1 umboð
Fiskimannafelag Meginfelag	1 umboð
Útróðrarmanna	1 umboð
Yvirmannafeløg	1 umboð
Feløgini hjá Arbeiðsfólki á Fiskavirkjunum	1 umboð
Felagið Laksaskip	1 umboð
Felagið	

lagtingslov om Fiskeriråd.

§ 1. Efter forslag fra erhvervet udnævner landsstyret et fiskeriråd med repræsentation fra foreninger indenfor fiskerierhvervet. Rådet har følgende repræsentation:

Salgsorganisationerne	1 repræsentant
Færøernes Råfiskekøberforening	1 repræsentant
Færøernes Rederiforening	1 repræsentant
Færøernes Fiskerforening	1 repræsentant
Hjemmefiskernes Hovedforbund	1 repræsentant
Officersforeningerne	1 repræsentant
Organisationer for arbejdere på fiskevirksom-	

Rækjuskip	1 umboð
Felagið	
Línuskip	1 umboð
Felagið	
Nótaskip	1 umboð
Felagið hjá	
trolbátum á	
landleiðini	1 umboð

Fyri hvørt umboð tilnevnir landsstýrið, eftir tilmæli frá vinnuni, 1 varaumboð.

2.stk. Onnur feløg, sum umboða ein rímuligan part av vinnuni, kunnu, við góðkenning landsstýrisins fáa umboð og varaumboð í ráðið.

3.stk. Ber umboð seg undan ella fer úr starvinum, tekur varaumboðið við.

4. stk. Umboð og varaumboð verða tilnevnd, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, tó fyrstu ferð tá henda lóg kemur í gildi.

hederne	1 repræsentant
Foreningen	
Lakseskibe	1 repræsentant
Foreningen	
Rejeskibe	1 repræsentant
Foreningen	
Lineskibe	1 repræsentant
Foreningen	
Ringnotskibe	1 repræsentant
Foreningen	
Trawlbåde på	
fiskeriterri-	
toriet	1 repræsentant

For hver repræsentant udnævner landsstyret, efter forslag fra erhvervet, 1 suppleant.

Stk. 2. Andre foreninger, som repræsenterer en rimelig andel af erhvervet, kan med landsstyrets godkendelse få en repræsentant og 1 suppleant i rådet.

Stk. 3. Hvis en repræsentant unddrager sig hvervet eller forlader sin stilling, indtræder suppleanten.

Stk. 4. Repræsentanter og suppleanter udnævnes, når et landsstyre er valgt efter hvert lagtingsvalg, dog første gang, når denne lov træder i kraft.

§ 2. Ráðið skipar seg við formanni og næstformanni.

2.stk. Ráðið heldur fund í minsta lagi 2 ferðir um árið.

§ 2. Rådet konstituerer sig med formand og næstformand.

Stk. 2. Rådet holder møde mindst 2 gange om året. For-

Formaðurin kallar inn til fundar. Um 5 umboð ella fleiri krevja tað skal formaðurin boða til fundar.

3. stk. Vinnan rindar ráðslimunum møguligan fundar-, ferða- og dagpening.

§ 3. Vald verður ein Fiskivinnu Starvsnevnd við 5 umboðum. Umboðini í Fiskivinnu Starvsnevndini kunnu ikki samstundis vera umboð í Fiskivinnuráðnum. Fiskivinnuráðið velur 4 umboð í Starvsnevndina soleiðis:

1) Umboð fyri fiskasølufeløg og Føroya Ráfiskakeyparafelag velja 1 umboð og 1 varaumboð.
2) Umboð fyri Føroya Fiskimannafelag, Meginfelag Útróðrarmanna og feløgunum hjá yvirmonnum velja 1 umboð og 1 varaumboð.
3) Umboð fyri feløgini hjá ar beiðsfólki á flaka virkjunum 1 umboð og 1 varaumboð.
4) Umboð fyri feløgini Laksaskip, Rækjuskip, Línuskip, Nótaskip og trolbátar á landleiðini velja 1 umboð og 1 varaumboð.
5) Landsstýrið velur 1 umboð, sum er formaður í Fiskivinnu Starvsnevndini, og 1 varaumboð.

mandøn giver mødeindkaldelse og hvis 5 repræsentanter eller flere kræver det, skal formanden indkalde til møde.

stk. 3. Erhvervet betaler eventuelt møde-, rejse- og dagpengebidrag.

§ 3. Der vælges et fiskerierbejdsudvalg med 5 repræsentanter. Repræsentanter i arbejdsudvalget kan ikke samtidig være repræsentanter i fiskerirådet. Fiskerirådet vælger 4 af medlemmerne i arbejdsudvalget, således:

1) Repræsentanterne for salgsorganisationerne og Færøernes Råfiskekøberforening vælger 1 repræsentant og 1 suppleant.
2) Repræsentanterne for Færøernes Fiskerforening, Hjemmefiskernes Hovedforbund og officersforeningerne vælger 1 repræsentant og 1 suppleant.
3) Repræsentanter for organisationerne for arbejderne på fiskerivirksomhederne vælger 1 repræsentant og 1 suppleant.
4) Repræsentanterne for foreningerne Lakseskibe, Rejeskibe, Lineskibe, Ringnotskibe og Trawlbåde på fiskeriterritoriet vælger 1 repræsentant og 1

Stk. 2. Starvsnevndin hevur loyvi at møta á fundum í Fiskivinnuráðnum, sum eygleiðari.

§ 4. Løgtings- og landsstýrislimir kunnu hvørki verða umboð ella varaumboð í Fiskivinnuráðnum ella Fiskivinnu Starvsnevndini.

2.stk. Landsstýrið setir skrivara, sum er tann sami hjá Fiskivinnuráðnum og Fiskivinnu Starvsnevndini.

3.stk. Landsstýrið ásetir samsýningina til formannin í Fiskivinnu Starvsnevndini. Umboðini í Starvsnevndini fáa fundar- og ferðapening eftir vanligu reglum landsstýrisins.

4. stk. Útreiðslur av Fiskivinnuráðnum og Fiskivinnu Starvsnevndini, herundir skrivaraløn, verða goldnar úr landskassanum.

§ 5. Landsstýrið leggur allar umfatandi fiskivinnuspurningar fyri Fiskivinnuráðið til ummælis. Eitt og hvørt umboð í Fiskivinnuráðnum hevur rætt til at fáa sjónarmið sín førd í fundarfrágreiðingar ráðsins. Fun-

suppleant.

5) Landsstyret vælger 1 repræsentant, som er formand, og 1 suppleant.

Stk. 2. Arbejdsudvalget kan møde som observatør til Fiskerirådets møder.

§ 4. Medlemmer af lagting og landsstyre kan hverken være repræsentanter eller suppleanter i Fiskerirådet og Fiskeri Arbejdsudvalget.

Stk. 2. Landsstyret udnævner en sekretær, der betjener både Fiskerirådet og Fiskeri Arbejdsudvalget.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter aflønningen til formanden i Fiskeri Arbejdsudvalget. Repræsentanterne i Arbejdsudvalget får møde- og rejsebidrag efter landsstyrets sædvanlige regler.

Stk. 4. Udgifter til Fiskerirådet og Fiskeri Arbejdsudvalget, herunder aflønning til sekretæren, afholdes af landskassen.

§ 5. Landsstyret forelægger Fiskerirådet alle større fiskerispørgsmål til høring. Enhver repræsentant i Fiskerirådet har ret til at få sine synspunkter gengivt i rådets møderefarater. Møderefaratet sendes landsstyret,

darfrágreiðingarnar verða sendar landsstýrinum, sum leggur tey við, tá málini fara til víðari politiska viðgerð.

Stk. 2. Fiskivinnuráðið kann av sínum eintingum taka fiskivinnumál til viðgerðar og geva landsstýrinum tilmæli.

Stk. 3. Fiskivinnuráðið sendir í minsta lagi eina ferð um árið landsstýrinum frágreiðing og tilmæli.

§ 6. Fiskivinnu Starvsnevndin er millumlið millum landsstýrið og Fiskivinnuráðið.

2. stk. Landsstýrið leggur uppskot til lógir, kunngerðir og reglugerðir, sum hava við fiskivinnuna at gera, fyri Fiskivinnu Starvsnevndina til ummælis.

§ 7. Fiskivinnuráðið ger viðtøkur fyri arbeiði sítt.

Stk. 2. Landsstýrið skal góðkenna viðtøkurnar.

§ 8. Landsstýrinum verður heimilað í kunngerð at seta nærri reglur fyri virkseminum hjá Fiskivinnuráðnum og Fiskivinnu Starvsnevndini.

§ 9. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

som vedlægger dem som bilag, når spørgsmålene går til videre politisk behandling.

Stk. 2. Fiskerirådet kan selv tage fiskerispørgsmål op til behandling og give landsstyret sin indstilling.

Stk. 3. Fiskerirådet tilsender mindst en gang om året landsstyret en beretning og indstilling.

§ 6. Fiskeri Arbejdsudvalget er nedsat mellem landsstyret og Fiskerirådet.

Stk. 2. Landsstyret forelægger forslag til love, bekendtgørelser, regulativer, som vedrører fiskerierhvervet for Fiskeri Arbejdsudvalget.

§ 7. Fiskerirådet udarbejder nærmere vedtægter for sit arbejde.

Stk. 2. Landsstyret skal godkende vedtægterne.

§ 8. Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler for Fiskerirådet og Fiskeri Arbejdsudvalget.

§ 9. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er

Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 53 frá 28. juni 1979 um fiskivinnuráð.

bekendtgjort. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 53 af 28. juni 1979 om Fiskeriråd.

Viðmerkingar:

Tá fiskivinnuráðið varð sett á stovn í 1979, var eingin fiskivinnuumsiting og ráðið fekk heimildir, sum eru bæði umsitingarligar og ráðgevandi. Hesar heimildir eru tó ikki nýttar í nógvum førum.

Limaskapurin í fiskivinnuráðnum sambært løgtingslóg nr. 53 frá 28. juni 1979 er persónligur og limirnir tala ikki fyri vinnuna sum heild.

Í samband við tað arbeiði, sum fer fram í løtuni í landsstýrinum viðvíkjandi broytingum í lógarverkinum fyri fiskivinnuna, er tað av stórum týdningi, at landsstýrið hevur eitt væl skipað orðaskifti við vinnuna, og at vinnan fær møguleika at siga sína hugsan um uppskot og broytingar.

Skotið verður tí upp, at lógin fyri fiskivinnuráðið verður broytt, so at fiskivinnuráðið verður skipað við beinleiðis umboðum fyri vinnuna. Í ráðnum skulu sita umboð fyri fiski- og útróðrarmenn, yvirmenn (Skipara- og Navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið og Motorpassarafelagið), arbeiðsfólkið á fiskavirkjunum, skipaeigarar, ráfiskakeyparar, sølufeløg, umframt umboð fyri áhugafeløgini fyri ymiskar veiðihættir, sum í løtuni eru: Felagið Laksaskip, Felagið Nótaskip, Felagið Rækjuskip, Trolarar á landleiðini og Samtakið Línuskip verða boðin á fund, um spurningar teimum viðvíkjandi eru til viðgerðar.

Fyri at skipa arbeiði ráðsins, velur ráðið 4 limir í eina starvsnevnd. Landsstýrið velur 5. limin, sum er formaður.

Ráðið fær ummælisrætt í umfatandi fiskivinnuspurningum, meðan landsstýrið leggur uppskot til lógir, kunngerðir og reglugerðir, sum hava ávirkan á vinnuna, fyri starvsnevndina. Viðmerkingarnar hjá ráðnum og limunum í ráðnum og starvsnevndini vera patur av

málsviðgerðini og fylgja málinum, tá tað kemur til víðari politiska viðgerð.

Útreiðslur til skipan og virki hjá ráði og starvsnevnd annars verður fíggjað av landskassanum.

Við hesum broytingum verður orðaskiftið við vinnuna vælskipað og dygt og trygd verður fyri at vinnan, um hon vil, fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Tað virðismikla hagtalsarbeiðið, sum fiskivinnuráðið higartil hevur skipað fyri, liggur í dag náttúrliga hjá Hagdeildini, sum undir ellum umstøðum ger grundleggjandi talarbeiðið. Stovnsmetingar og uppskot til, hvussu stóvnarnir skulu røktast, koma longu í dag í almennum frágreiðingum frá Fiskirannsóknarstovuni. Sambindingin av náttúrugrundarlagnum og búskapartølunum verður samanfatað av fiskivinnuumsitingini.

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður

/ Kjartan Hoydal

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 74/1989: Løgtingslóg um fiskivinnuráð.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 14. februar 1990 og eftir 1. viðgerð 16. februar 1990 beint í fiskivinnunevndina.

Undir viðgerðini varð gjørt vart við, at brøv eru komin frá feløgunum Ídnaðarskip og Skipara- og navigatørfelagnum, har hesi biðja um umboðan í ráðnum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tey skriv, ið eru komin til fiskivinnunevndina frá feløgunum Ídnaðarskip, Trolskip, Føroya Reiðarafelag, Føroya Skipara- og navigatørfelag og Føroya Fiskimannafelag, har hesi biðja um umboðan í ráðnum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og ein/tveir minnilutar.

Meirilutin (John Petersen, Jógvan Durhuus, Petur Reinert, Suni Jacobsen og Jákup Lamhauge) tekur undir við, at omanfyrinevndu fáa umboðan í fiskivinnuráðnum eftir § 1 og í fiskivinnu starvsnevndini samboert § 3, og setir tí fram

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) § 1 verður soljóðandi: Eftir tilmæli frá vinnuni tilnevnir landsstýrið fiskivinnuráð við umboðum fyri fiskivinnuna. Í ráðnum skulu vera hesi umboð:	1) § 1 affattes således: Efter forslag fra erhvervet udnævner landsstyret et fiskeriråd med repræsentation fra foreninger indenfor fiskerierhvervet. Rådet har følgende

Fiskasølufeløgini	1 umboð
Ráfiskakeyparafelag	1 umboð
Føroya Reiðarafelag	1 umboð
Føroya skipara- og navigatørfelag	1 umboð
Føroya maskin- og motorpassarafelag	1 umboð
Felagið Trolskip	1 umboð
Felagið Íðnaðarskip	1 umboð
Føroya Fiskimannafelag	1 umboð
Meginfelag Útróðrarmanna	1 umboð
Feløgini hjá arbeiðsfólki á fiskavirkjunum	1 umboð
Felagið Laksaskip	1 umboð
Felagið Rækjuskip	1 umboð
Felagið Línuskip	1 umboð
Felagið Nótaskip	1 umboð
Felagið hjá trolbátum á landleiðini	1 umboð

Fyri hvørt umboð tilnevnir landsstýrið, eftir tilmæli frá vinnuni, 1 varaumboð.

2) § 3, stk. 1, pkt. 2 verður soljóðandi:

"Umboð fyri Føroya Fiskimannafelag, Meginfelag Útróðrarmanna, Skipara- og navigatørfelagið, Maskin- og motorpassarafelagið velja 1 umboð og 1 varaumboð."

3) § 3, stk. 1, pkt. 4 verður soljóðandi:

"Umboð fyri Føroya Reiðarafelag, feløgini Laksaskip, Rækjuskip, Línuskip, Nótaskip, Trolskip, Íðnaðarskip og trolbátar á landleiðini velja 1 umboð og 1 varaumboð."

repræsentation:	
Salgsorganisationerne	1 repræsentant
Færøernes Råfiskekøberforening	1 repræsentant
Færøernes Rederiforening	1 repræsentant
Færøernes skipper- og navigatørforening	1 repræsentant
Færøernes maskin- og motorpasserforening	1 repræsentant
Foreningen Trawlskibe	1 repræsentant
Foreningen Industrifiskeskibe	1 repræsentant
Færøernes Fiskerforening	1 repræsentant
Hjemmefiskernes Hovedforbund	1 repræsentant
Organisationer for arbejdere på fiskerivirksomhederne	1 repræsentant
Foreningen Lakseskibe	1 repræsentant
Foreningen Rejeskibe	1 repræsentant
Foreningen Lineskibe	1 repræsentant
Foreningen Ringnotskibe	1 repræsentant
Foreningen Trawlbåde på fiskeriterritorier	1 repræsentant

For hver repræsentant udnævne landsstyret, efter forslag fr

Minnilutin (Henrik Old) heldur tað verða rætt, at fiskivinnan, sum er berandi í samfelagnum sleppur at føra síni sjónarmið fram yvir fyri myndugleikunum, og heldur minnilutin tað verða rætt, at fiskivinnuráðið verður valt á so breiðum grundarlagi sum tilber.

Eisini skjýtur minnilutin upp, at Føroya Fiskimannafelag og Meginfelag Útróðrarmanna fáa serstakt umboð í starvsnevndina. Eftir landsstýris uppskotinum er eingin trygd fyri, at Føroya Fiskimannafelag og Meginfelag Útróðrarmanna fáa umboð í starvsnevndini. Hetta kann ikki vera rætt, tí hesi bæði feløg umboða allar føroyskar fiski- og útróðrarmenn.

Har afturat er Føroya Fiskimannafelag einasta felag, ið hevur nýtilig hagtøl yvir fiskiveiðu og inntøkur fiskimanna. Tí skjýtur minnilutin upp, at Fiskivinnustarvsnevndin verða 7 limir, eins og núverandi fiskivinnuráð, har Føroya Fiskimannafelag fær ein lim og Meginfelag Útróðrarmanna fær 1 lim.

Minnilutin tekur undir við uppskoti meirilutans um broytingarnar í § 1, har Føroya Skipara- og Navigatørfelagið, Felagið Trolskip og Felagið Íðnaðarskip fáa hvør sítt umboð. Viðvíkjandi § 1 verður mælt til, at Føroya Fiskimannafelag fær 2 umboð í staðin fyri sum skotið upp av landsstýrinum eitt umboð, og viðvíkjandi § 3 at Føroya Fiskimannafelag og Meginfelag Útróðrarmanna fáa hvør sítt umboð í Fiskivinnu Starvsnevndini, soleiðis at samlaðu umboðini verða 7, sí omanfyri.

Fyri at fáa meira javnvág millum áhugabólkarnar mælir minnilutin til, at hesar broytingar í samansetingini av ráðnum verða gjørdar og samsvarandi hesum verður sett minnilutin fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1, stk. 1 verður orðingin "Føroya Fiskimannafelag 1 umboð" broytt til: "Føroya Fiskimannafelag 2 umboð".	1) I § 1, stk. 1 bliver formuleringen "Færøernes Fiskerforening 1 repræsentant" ændret til:

2) Í § 3, stk. 1, verður orðingin soljóðandi:

"Vald verður ein fiskivinnu starvsnevnd við 7 umboðum. Umboðini í fiskivinnu starvsnevndini kunnu ikki samstundis vera umboð í fiskivinnuráðnum. Fiskivinnuráðið velur 6 umboð í starvsnevndina soleiðis:

1) Umboð fyri fiskasølufeløg og Føroya ráfiskakeyparafelag velja 1 umboð og 1 varaumboð.
2) Umboð fyri Skipara- og navigatørfelagið, Maskinmeistara- og motorpassarafelagið velja 1 umboð og 1 varaumboð.
3) Feløgini hjá arbeiðsfólki á flakavirkjunum velja 1 umboð og 1 varaumboð.
4) Umboð fyri Føroya Reiðarafelag, feløgini Laksaskip, Rækjuskip, Línuskip, Nótaskip, Trolskip, Ídnaðarskip og trolbátar á landleiðini velja 1 umboð og 1 varaumboð.
5) Umboð fyri Føroya fiskimannafelag velja 1 umboð og 1 varaumboð.
6) Umboð fyri Meginfelag Útróðrarmanna velja 1 umboð og 1 varaumboð.
7) Landsstýrið velur 1 umboð, sum er formaður í Fiskivinnu starvsnevndini, og 1 varaumboð.

"Færøernes Fiskerforening 2 repræsentanter".

2) I § 3, stk. 1, bliver formuleringen:

"Der vælges et fiskeriarbejdsudvalg med 7 repræsentanter. Repræsentanter i arbejdsudvalget kan ikke samtidig være repræsentanter i fiskerirådet. Fiskerirådet vælger 6 af medlemmerne i arbejdsudvalget, således:

1) Repræsentanterne for salgsorganisationerne og Færøernes Råfiskekøberforening vælger 1 repræsentant og 1 suppleant.
2) Repræsentanterne for Skipper- og navigatørforeningen, Maskinmester- og motorpasserforeningen vælger 1 repræsentant og 1 suppleant.
3) Repræsentanter for organisationerne for arbejderne på fiskerivirksomhederne vælger 1 repræsentant og 1 suppleant.
4) Repræsentanterne for Færøernes Rederiforening, foreningerne Lakseskibe, Rejeskibe, Lineskibe, Ringnotskibe, Trawlskibe, Industriskibe og Trawlbåde på fiskeriterritoriet.
5) Repræsentanterne for Færøernes Fiskerforeningvælger 1 repræsentant og 1 suppleant.
6) Repræsentanterne for Hjemme-

fiskernes Hovedforbund vælger 1 repræsentant og 1 suppleant.

7) Landsstyret vælger 1 repræsentant, som er formand, og 1 suppleant.

Minnilutin (Lasse Klein) heldur ikki, at tað er heppið at seta nýtt fiskivinnuráð á stovn, tí tað gamla í fullan mun uppfyllir allar treytir tá talan er um rágeving bæði til politisku myndugleikarnir og almenningin annars á fiskivinnuøkinum.

Minnilutin kann ikki góðtaka at bert landsstýri skal fáa metingar frá ráðnum, og metir at tað hevur tíðning at eisini almenningurin fær frágreiðingar frá ráðnum um hennara niðurstøður.

Annars verður víst til partar av viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 75.

Minnilutin tekur sostatt ikki undir við landsstýrisuppskotinum.

FISKIVINNUNEVNDIN, 6. mars 1990.

John Petersen | Suna Jacobsen | Jákup Lamhauge

Jógvan Durhuus | Petur Reinert | Henrik Old

Lasse Klein

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

14. februar 1990

TF. 11080 . Telex 81310 tinqus fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Afgreiðslutíð: Kl. 10—15, laygardag stongt

KH/or

F. L. j. nr.
(at tiskila í svari)

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 75/1989: Løgtingslóg um upphøggingarstuðul.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um upphøggingarstuðul.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað í 1990 og 1991 at veita fiskiførum, skrásett í Føroyum, upphøggingarstuðul við tí endamáli at fáa veiðuorku úr fiskiflotanum.

Stk. 2. Stuðulin til upphøgging kann veitast á henda hátt:

1) Hann, sum eigur fiskifar, skrásett í Føroyum, kann søkja Føroya Landsstýri um upphøggingarstuðul. Verður umsóknin játtað, letur landskassin 5.000 kr. í studningi fyri hvørt tonsið veitt í meðal 4 tey bestu árini av 6 teimum seinastu árunum, áðrenn umsókn verður send inn, og

lagtingslov om ophørsstøtte.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til i 1990 og 1991 at give ophørsstøtte til fiskefartøjer, der er hjemmehørende på Færøerne, med det formål at få overflødig fangstkapacitet ud af fiskeflåden.

Stk. 2. Ophørsstøtten kan ydes på følgende måde:

1) Ejere af fiskefartøjer, der er hjemmehørende på Færøerne, kan indsende ansøgning om ophørsstøtte. Bevilges ansøgningen, udbetales 5.000 kr. i støtte for hvert tons, fisket i gennemsnit de 4 hedste år af 6 de foregående år, inden ansøgningen indsen-

10.000 kr. í studningi fyri hvørt bruttoregistartons í máltibrævinum hjá fiskifarinum.

2) Landsstýrinum verður heimilað at keypa fiskifar á tvingsilssølu til upphøggingar, hóast landskassin ikki hevur veð í farinum ella veðheldur fyri láni í tí. Somuleiðis verður heimilað landsstýrinum á tvingsilssølu at bjóða upp um tað, sum landsstýrið hevur veð í ella veðheldur fyri. Eisini verður heimilað landsstýrinum at keypa skip frá t.d. peningastovni ella figgjarstovni, til upphøggingar.

3) Landsstýrinum verður heimilað at gera avtalu við skipa- ella bátaeigara og p e n i n g a - e l l a figgjarstovnar, sum hava veð í fiskifari, um, hvussu skuldin í farinum skal greiðast.

4) Tá fiskifar verður upphøgt smb. nr. 2 og nr. 3 eru upphæddirnar, nevndar í stk. 2, nr. 1, eisini galdandi sum mesta mark fyri tí, sum kann veitast.

des, og 10.000 kr. for hvert bruttoregistertons i fartøjets målebrev.

2) Landsstyret bemyndiges til at købe fiskefartøjer på tvangsauktion til ophør, uanset landskassen har pant i fartøjet eller garanterer for lån i fartøjet. Ligeledes bemyndiges landsstyret til ved tvangsauktion at afgive bud, der overstiger landsstyrets egne pant eller garantiforpligtelser. Ligeledes bemyndiges landsstyret til at erhverve et fartøj fra et p e n g e i n s t i t u t eller financieringsinstitut til ophør.

3) Landsstyret bemyndiges til at indgå aftale med ejere af fiskefartøjer og penge- og financieringsinstituttet, som har pant i fartøjet, om hvordan gælden i fartøjet skal afvikles.

4) Ydes der ophørsstøtte til et fartøj efter nr. 2 eller nr. 3, gælder de beløb, som er nævnt i stk. 2, nr. 1, som maksimumbeløb for støttebidrag.

§ 2. Fyri at fáa upphøggingarstuðul skal fiskifar

§ 2. For at kunne modtage ophørsstøtte, skal fartøjet

hava havt sama eigara í minsta lagi 2 tey seinastu árini.

Stk. 2. Fiskifar, sum fær upphøggingarstuðul, missir veiðuloyvið og kann ikki fáa veiðuloyvið aftur.

Stk. 3. Fiskifar, sum hevur fingið upphøggingarstuðul, kann ongan stuðul ella studning fáa úr landskassanum aftur til nakað endamál. Henda regla umfatar ikki tann studning, sum føroyskar skipasmiðjur fáa, tá tær umbygja skip.

Stk. 4. Reglurnar í stk. 2 og 3 eru eisini galdandi fyri tey fiskifør, sum Føroya Landsstýri keypir ella ger avtalu um smb. § 1, stk. 2, nr. 2 og nr. 3.

§ 3. Peningur, sum verður nýttur til upphøgging samb. § 1, verður tikin úr Upphøggingargrunninum.

Stk. 2. Fæ grunsins er játtanin á teimum árligu fíggjarløgtingslógunum ella játtan smb. serligari lóg.

Stk. 3. Landsstýrinum verður heimilað í samráð við fíggjarnevnd Føroya Løgtings at taka upp til 100 mió. kr. í láni til Upphøggingargrunnin.

have haft samme ejer mindst de 2 sidste år.

Stk. 2. Et fartøj, som har fået ophørsstøtte, mister fiskerilicensen, og kan ikke opnå ny fiskerilicens.

Stk. 3. Fiskefartøjer, som har modtaget ophørsstøtte, kan ikke senere modtage nogen form for støtte eller subsidie fra landskassen til noget formål. Denne regel omfatter ikke støtte til færøske værfter i forbindelse med ombygning af skibe.

Stk. 4. Reglerne i stk. 2 og stk. 3 gælder også for fartøjer, som landsstyret køber eller indgår aftale om i medfør af § 1, stk. 2, nr. 2 og nr. 3.

§ 3. Midler, der bevilges til ophørsstøtte ifølge § 1, udbetales af ophørsfonden.

Stk. 2. Fondens midler bevilges på de årlige lagtingsfinanslove eller bevilges ved særlig lagtingslov.

Stk. 3. Landsstyret bemyndiges til i samråd med lagtingets finansudvalg at optage lån på op til 100 mio. kr. til ophørsfonden.

§ 4. Landsstýrinum verður heimilað at seta nærri reglur fyri upphøggingarstuðul í kunngerð sambært hesi lóg.

§ 5. Um ikki størri revsing er uppiborin eftir aðrari lóg, kann tann verða sektaður, sum av svikaligum gevur rangar upplýsingar í samband við umsókn um upphøggingarstuðul.
Stk. 2. Fyri brot, sum gjørd eru av partafeløgum, smápartafeløgum, lutafeløgum e.t. kann felagnum sum slíkum verða álagd bótarskylda.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 1991.

§ 4. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere regler ved bekendtgørelse for ophørsstøtte.

§ 5. Medmindre højere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning, straffes med bøde den, der svigagtig afgiver urigtige oplysninger i forbindelse med ansøgninger om ophørsstøtte.
Stk. 2. For overtrædelser, der begås af aktieselskaber, anpartsselskaber, andelsselskaber e.l., kan der pålægges selskabet som sådant et bødeansvar.

§ 6. Denne lov træder i kraft dagen efter, den er bekendtgjort, og ophæves 31. december 1991.

Viðmerkingar:

Peningur er í fleiri ár settur av á fíggjarlógini til upphøgging av føroyskum fiskiførum við tí endamáli at minka veiðutrýstið. Tilsagnir fyri 73 mió. kr. eru givnar smb. reglum, sum landsstýrið og fíggjarnevndin ásettu.

Eftir hesum reglum fingu Realkreditstovnurin og Fiskaríbankin 100% av lánunum afturgoldin, og aðrir fingu upp til 80%.

Landsstýrið heldur ikki, at skuldin í skipinum eigur at vera avgerandi fyri upphæddina, men at tað harafturímóti eigur at vera avgerandi, hvussu stór veiðuorka fæst burtur. Landsstýrið ætlar framvegis eisini at lata upphøggingarstuðul til fiskifør, sum

ikki hava verið í fiskiskapi í eina tíð, við tí endamáli at fáa veiðuloyvið frá tí. Studningurin verður í slíkum førum 10.000 kr. fyri hvørt bruttoregistartons.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar.

ad. § 1. Tað er umráðandi, at veiðutrýstið á grunnunum minkar skjótt. Tí verður sett í lógina, at upphøggingarstuðul kann bert fáast í 1990 og 1991.

Talan er um 3 sløg av upphøggingarstuðuli. Studningur kann veitast soleiðis, at goldnar verða 10.000 kr. fyri hvørt brutto registargons og 5.000 kr. fyri hvørt tons, sum farið hevur veitt í meðal 4 tey bestu av 6 teimum seinastu árunum, áðrenn umsókn um stuðul verður send inn.

Eisini kann landsstýrið keypa skip á tvingsilssølu ella frá t.d. peningastovni við tí endamáli at høgga tey upp. Heimildin at keypa á tvingsilssølu er eisini galdandi, hóast landskassin ikki hevur veð í farinum ella veðheldur fyri tí.

Í triðja lagi kann landsstýrið gera avgalu við skipa- ella bátaeigara og banka ella aðrar fíggjarstovnar um, hvussu skuld í farinum kann greiðast. Samráðingar hava verið við teir báðar stóru føroysku bankarnar um hetta.

Í hesum báðum seinni førunum eru mørkini 5.000 kr. og 10.000 kr. eisini galdandi.

ad. § 2. Henda grein viðvíkur treytum fyri at fáa og avleiðingar av at fáa upphøggingarstuðul. Fiskifarið skal hava havt sama eigara í minsta lagi í 2 ár, tað missir veiðuloyvið við alla og fær í framtíðini ongan stuðul úr landskassanum.

Í kunngerð verður haraftrat sett, at møguligt avlop av upphøggingarstuðuli skal skattast sum avlop av skipasøli, og at fiskifør, sum hava fingið upphøggingarstuðul, kunnu ikki liggja óbrúkt í meira enn 1 ár.

Ætlanin er, at eigari, sum fær upphøggingarstuðul, framvegis skal eiga farið við nevndu treytum, og at hann kann selja tað ella nýta tað til onnur endamál enn fiskiskap. Hetta merkir, at endamálið við upphøggingarstuðlinum er fyrst og fremst at fáa veiðuloyvi frá skipum og bátum.

ad. § 3. Her verður skotið upp at heimila landsstýrinum í samráð við fíggjarnevndina at læna upp til 100 mió. kr. til Upphøggingargrunnin. Grunnurin hevur fingið og fær eina upphædd játtoa á fíggjarlógini, og somuleiðis er ein heimild frammanundan at taka 30 mió. kr. í láni til grunnin.

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður

/ Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 75/1989: Løgtingslóg um upphøggingarstuðul.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 14. februar 1990 og eftir 1. viðgerð 16. februar beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Jógvan Durhuus, Petur Reinert, Suni Jacobsen og Jákup Lamhauge) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum at samtykja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Henrik Old) førir fram, at við uppskotinum um upphøggingarstuðul ásannar landsstýrið, at neyðugt er at fáa eina upphøggingarskipan aftur at virka aftaná, at hetta hevur ligið á láni í meira enn eitt ár, tí "sitandi" samgonga steðgaði teirri skipan, sum var.

Hóast tey lýti, hon hevði, fekk hon tó 18 skip (fiskiloyvir) úr flotanum. Javnaðarflokkurin heldur tó, at tað er torført at taka endaliga avgerð um skipanina við upphøgging uttan, at hetta verður gjørt í samanhangi við aðrar avgerðir, ið takast skulu fyri at fremja strukturbroyting í fiskivinnuni.

Nevnast skulu nakrir spurningar, ið eiga at viðgerast meira nágreiniliga.

Eitt er, um skipanin við bruttotonsum og veiddum tonsum er nóg væl javnvigað. T.d. kunnu laksaskip neyvan koma undir hesa skipan.

Eigur ikki ein ávís upphædd at verða sett sum loft fyri veitingunum?

Hetta kundi verið metingarvirðið ella tryggingarvirðið ella prosentupphædd av hesum.

Er skipanin við, at eigarin verður verandi eigari av

skipinum eftir, at hann hevur fingið útgoldið upphøggingarstuðul, í tráð við vanliga rættsuppfatan?

Tryggjar skipanin at minkingin av veiðuorku fer fram innan teir veiðuhættir, ið elva størsta trýstið?

Sum flest øll vita, so komu fyrst í 80 árunum fleiri skip úr íðnaðarveiðu í Norðsjónum heim á føroyaleiðina at trola eftir botnfiski.

Nú sær út sum, at føroyingar ikki nýta alla sína kvotu av íðnaðarfiski í Norðsjónum. Taka vit árið 1989, so vóru tað sløk 20.000 tons av íðnaðartiski í norskum øki, sum føroyingar ikki veiddu, umframt nakað frá EF.

Lítil meining er í at býta um við henda fisk, um ikki áherðsla verður løgd á at veiða sum mest av hesi kvotu. Tí hevði verið rætt, um eini 3-4 trolskip beinanvegin fingu (partvísa upphøgging/stuðul), so tey komu á eitt kostnaðarstøði, sum íðnaðarveiða í Norðsjónum kundi borið, samtíðis sum tey mistu veiðuloyvi eftir botnfiski við Føroyar. Soleiðis kundu hesi skip verið verandi í flotanum og varðveitt sum arbeiðsplass.

Tí verður sett soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at broyta reglugerðina fyri upphøgging, so møguligt er at veita partvísan upphøggingarstuðul, so nøkur skip kunnu fara á íðnaðarveiðu, treytað av, at tey missa fiskiloyvið eftir botnfiski við Føroyar.

Minnilutin (Lasse Klein) førir fram, at funnist verður at, at hetta mál verður skundað ígjøgnum, og at minnilutin ikki hevur havt stundir at viðgjørt hetta stóra mál, sum er ein partur av "uppritinum", sum samgongan hevur boðað frá í sambandi við loysnina av fiskivinnutrupuleikunum. Í øðrum parlamentariskum londum høvdu tey rodnað av skomm yvir slíka viðgerð, og er talan um eina háðan og undirgraving av demokratisku skipan okkara. Eingin ivi er um, at bólkar, sum royna at hótta demokratisku skipanina aðrastaðni, høvdu lært nógv av tí, sum hendir í føroyska samfelagnum í dag.

Hesin málburður er ikki vanligur á okkara leið, og er heldur ikki hóskandi undir vanligum umstøðum, men tá talan er um háttin, sum samgongan leggur upp til í spurningínum um at avgreiða mál uppá og víkja burtur frá allari vanligari mannagongd og ikki gevur minnilutanum møguleika at viðgera málið, so eru orsøkir til at trúgva, at samgongan er óreiðilig og effektiv á ein heilt óvanligan hátt.

Hesin arbeiðshátturin minnir ikki sørt um ta mannagongd, sum varð brúkt eystanfyri í teimum sosialistisku londunum, áðrenn fólkið gjørdi uppreistur.

Minnilutin mótmælir harðliga, at ikki stundir verða givnar andstøðuni at viðgera málið á ein reiðiligan hátt, og kann undir ongum umstøðum góðtaka, at mál verða viðgjørd á slíkan tilvildarligum støði.

Andstøðan hevur ongan møguleika havt fyri at viðgjørt hetta mál út í æsir, og hesum hava vit eisini mótmælt undir nevndarviðgerðini. (Samgongan hevur arbeitt við spurningínum í eitt hálvt ár).

Frammanundan hava vit havt eina kunngerð um spurningin um upphøggingarstuðul, og bygdi hendan kunngerð á eina viðmerking í fíggjarløgtingslógini fyri 1988 og 1989, og sjálvt um Sjálvstýrisflokkurin var við til at seta kunngerðina í gildi í síni tíð, ásanna vit, at hetta var eitt mistak.

Hetta uppskotið um løgtingslóg um upphøggingarstuðul er bert ein partur av "fiskivinnupakkanum", sum samgongan hevur boðað frá, og tað sæst týðuliga og greitt, at samgongan

leggur dent á í sínum politikki almenna stýring á so at siga øllum økjum, eina kúgaða stýring, eina sentralstýrda stýring, ein stýring, sum um stutta tíð kemur at leggja alt samfelagið í sor.

Minnilutin kann undir ongum umstøðum góðtaka, at vikið verður burtur frá fríu marknaðarskipanini, og at liberala hugsjónarstøðið, sum alt okkara samfelag byggir á, verður lagt í oyði.

Uppskotið leggur dent á, at landskassin letur kr. 5.000 fyri hvørt tonsið, og kr. 10.000 í studningi fyri hvørt bruttoregistartons í mátibrævinum hjá fiskifarinum.

Her verður fyrst og fremst hugsað um nøgdirnar av fiski, sum skipini veiða, íðnaðarskipini, svartkjaftaskipini og trolararnir, í meðan útróðrarbátarnir og laksabátarnir verða fyri stórum vanbýti.

Sama er galdandi, tá talan er um støddina á skipunum.

Hetta er ein sera óheppin og óhugnalig skipan, serstakliga tá vit hava í huganum, at samgongumenn í ein rættliga stóran mun varða av júst hesum skipum, og tað er heldur einki at siga til at ívísir bankar lovprísa "uppritinum". Talan er í høvuðsheitum um persónlig bjargingartiltøk, og ikki um áhugamál samfelagsins.

Talan er um eina skipan, sum uttan iva kemur at seta enn størri krøv til landskassan, og gevur einstaklinginum enn størri byrðar.

Minnilutin mælir frá at samtykkja uppskot landsstýrisins, og mælir í staðin til, at fría marknaðarskipanin aftur fer at virka í føroyska samfelagnum.

FISKIVINNUNEVNDIN, 6. mars 1990.

Suni Jacobsen | Jákup Lamhauge | Jógvan Durhuus

Petur Reinert | Svend Aage Ellefsen | Henrik Old

Lasse Klein

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080. Telex 41310 tlxgos fa. Telefax 14947. Postbox 64
Avgreiðsluvið: Kl. 10—15, leygardag stongt

14. februar 1990

F. L. j. nr.
(at tilvísa í svari) 2128-6

FTS/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 76/1989: Lán til bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um Lán til bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali.	lagtingslov om lån til bygning af afdeling af Færøernes Handelsskole i Kambsdalur.
§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at veita Føroya Handilsskúla eitt rentu- og avdráttarfrítt lán við upprykkjandi veð í ognini, matr. nr. 871^{h}, uppá í mesta lagi 7,0 mió. kr. til liðugtgerð av skúlanum.	**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til at yde Føroya Handilsskúla et rente- og afdragsfrit lån med oprykkende pant i ejendommen matr. nr. 871^{h}, på maksimalt 7,0 mio. kr. til færdiggørelse af skolen.
§ 2. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at upptaka neyðug lán til veiting av nevnda láni.	**§ 2.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage nødvendige lån til ydelse av nævnte lån.
§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	**§ 3.** Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1986 um stuðul til bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali hevur landsstýrið heimild at veita handilsskúlanum upp til 7,5 mió. kr. í studningi til byggingina, og landsstýrið hevur somuleiðis heimild landskassans vegna at taka upp neyðug lán til veiting av nevnda studningi.

Tá varð roknað við, at samlaði byggikostnaðurin fór at vera umleið 20 mió. kr.

Kenslumálaráðið hevur góðkent, at bygging kundi verða framd til teknisku skúlarnar og handilsskúlan í Føroyum fyri upp til 30 mió. kr., tað ver fyri upp til 15 mió. kr. í ríkisláni, og kenslumálaráðið hevði herumframt biðið føroysku skúlamyndugleikarnar taka avgerð um, hvør bygging skuldi verða framd. Í tann mun samlaði byggikostnaðurin fór upp um 30 mió. kr., skuldu føroysku skúlamyndugleikarnir sostatt yvirfyri ríkismyndugleikunum vátta, at landskassin vildi bera meirkostnaðin.

Eftir hesum fór kostnaðurin av byggingini av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali uppá tilsamans 20 mió. kr. at verða fíggjað soleiðis:

Av kostnaðarrammu kenslumálaráðsins 15 mió. kr.:	
Prioritetslán 1/3 ella	5,0 mió. kr.
Ríkislán 1/2 ella	7,5 mió. kr.
Landskassastudningur 1/6 ella	2,5 mió. kr.
Tilsamans	15,0 mió. kr.
Landskassastudningur svarandi til munin millum samlaða kostnaðin 20 mió. kr. og kostnaðarrammuna 15 mió. kr. ella	5,0 mió. kr.
Tilsamans	20,0 mió. kr.

Samlaði landskassastudningurin fór eftir hesum at vera 7,5 mió. kr.

Upplýst er nú, at tað verður mett, at samlaði kostnaðurin fer at verða 27,0 mió. kr.

Hesin kostnaðurin verður at fíggja soleiðis:

Av kostnaðarrammu kenslumálaráðsins:	
Prioritetslán 1/3 ella	5,0 mió. kr.
Ríkislán 1/2 ella	7,5 mió. kr.
Landskassastudningur 1/6 ella	2,5 mió. kr.
Tilsamans	15,0 mió. kr.
Landskassastudningur svarandi til munin millum samlaða kostnaðin 27,0 mió. kr. og kostnaðarrammuna 15 mió. kr. ella	12,0 mió. kr.
Tilsamans	27,0 mió. kr.

Samlaði landskassasstudningurin og landskassalán verður eftir hesum 14,5 mió. kr., og sum frammanfyri tilskilað hevur landsstýrið í løgtingslóg nr. 35/1986 heimild at rinda studning upp til 7,5 mió. kr.

Landsstýrið leggur sostatt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um, at landsstýrinum verður heimilað at rinda Føroya Handilsskúla upp til 7,0 mió. kr. í rentu- og avdráttarfríum láni til liðugtgerð av deild skúlans á Kambsdali.

Signar Hansen
landsstýrismaður

/ Eyðfinnur Jacobsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 76/1989: Lán til bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 14. februar 1990 og eftir 1. viðgerð tann 22. februar beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur havt fund við avvarðandi landsstýrismann og við landsskúlafyrisitingina og fingið frágreiðing um hvussu meirkostnaðurin kemur fram og er viðlagt skjal hesum viðvíkjandi.

Fíggjarnevndin átalar enn einaferð at almenn bygging ikki verður hildin innanfyri játtaðar karmar og áleggur landsstýrinum at tryggja at slíkt ikki endurtekur seg.

Samsvar má verða millum játtan og nýtslu og verður í hesum sambandi víst til fíggjarnevndarálitið í løgtingsmáli nr. 12/1989: Løgingslóg um fígging av hølum til Tolleftirlitið.

Út frá tí at byggingin er framd og peningurin nýttur, tekur ein sand nevnd undir við uppskoti landsstýrisins.
+ skjal.

FÍGGJARNEVNDIN, tann 21. mai 1990

Anfinn Kallsberg — Flemming Mikkelsen — Heine O. Heinesen

Eilif Samuelsen — Jørgen Thomsen — Jógvan Durhuus

Tordur Niclasen

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURDS-OG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr.77/1989: Viðvíkjandi strukturbroytingum í fiskivinnuni.

U P P S K O T

til

samtykkur

Løgtingið fer sum skjótast undir viðgerð av uppriti landsstýrisflokkana um struktulbroytingar í fiskivinnuni

Viðmerkingar:

Sum tingmonnum kunnugt er uppritt samgongurnar um broytingar í fiskivinnuni sent løgtinginum og eftir tingmonnum.

Fiskivinnan er hovuðsvinna okkara, og hevur ómetaleða uppriti tí vakt ólikan ans millum manna.

Tað er ikki óvanigt í øðrum londum,at hovuðsorðaskifti verð hava , tá slík stórmál eru løgd fram, og vilja vit skjóta upp, at so verður í hesum fori hjá okkum eisini, tí at ivaspurningarnir tykjast at vera nógvir og stórir.

Á FØROYA LØGTINGI 14.februar 1990

Tordur J. Niclasen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 77/1989: Viðvíkjandi strukturbroytingum í fiskivinnuni.

Málið er framlagt av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 16. februar 1990 og eftir 1. viðgerð 21. februar beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Suni Jacobsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Durhuus og Petur Reinert) førir fram, at uppskotini í fiskivinnuuppriti samgongunnar verða viðgjørd so hvørt sum tey koma fyri tingið. Vist verður til løgtingsmálini nr. 74/1989: Løgtingslóg um fiskivinnuráð og nr. 75/1989: Løgtingslóg um upphøggingarstuðul, sum í løtuni fáa tingviðgerð, og setir meirilutin tí einki uppskot fram.

Minniluti (Hernik Old og Tórbjørn Poulsen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykja uppskot Kristiliga fólkaflokksins, Førcya framburðs- og fiskivinnuflokks.

FISKIVINNUNEVNDIN, 16. mars 1990.

Svend Aage Ellefsen | Suni Jacobsen | Jákup Lamhauge

Jógvan Durhuus | Petur Reinert | Hernik Old

Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11080 . Telex 81310 tlsvs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

16. februar 1990

F. L. j. nr.
vat tilskila í svari: 440-66

JH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 78/1989: Lán til landskassan.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um lán til landskassan.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán upp til 650 mió. kr. ella samsvarandi upphædd í fremmandum gjaldoyra, at nýta til bøting um gjaldføri landskassans og til afturgjalding av láni.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om lån til landskassen.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån op til 650 mio. kr. eller tilsvarende biløb i fremmed valuta at anvende til forbedring af landskassens likviditet og til indfrielse af lån.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelsen.

Viðmerkingar:

Likviditetur landskassans hevur seinasta árið verið sera strammur, so tað hevur verið trupult at halda landskassans skyldur.

Størsta orsøkin til hesa trongstøðu er, at landskassin hevur

verið noyddur at leggja út fleiri hundrað mió. kr. í effektivum veðhaldum.

Fyri at bøta um landskassans likviditet og til afturrinding av láni, sum alt fellur til gjaldingar í ár, hevur landsstýrið samtykt at søkja løgtingið um heimild til at taka eitt uttanlands lán stórt 650 mió. kr.

Landsstýrið hevur eitt obligatiónslán frá 1980 úr Danmark, sum alt fellur til gjaldingar 1. juli í ár við 138 mió. kr.

Í 1988 tók landsstýrið ein kassakreditt í Sjóvinnubankarum og Føroya Banka uppá 80 mió. kr. tilsamans at nýta til afturrinding av avlopsskatti fyri 1987. Við rentum er hesin kassakredittur nú komin uppá 100 mió. kr.

Umframt tær effektivu veðhaldsupphæddir, sum goldnar eru, eru aðrar veðhaldsskyldur, sum falnar eru til gjaldingar, men enn ikki goldnar. Hesar skyldur eru umleið 150 mió. kr. til føroysku peningastovnarnar umframt stórar upphæddir til útlendskar fíggingarstovnar.

Heraftrat kemur, at landskassans rættur til at trekkja uppá Nationalbankan er fult nýttur í løtuni, og er upphæddin nú 300 mió. kr.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/ Jálgrim Hilduberg

A l i t

I

løgtingsmáli nr. 78/1989: Lán til landskassan.

Málið var framlagt av landsstýrinum tann 16. februar 1990 og eftir 1. viðgerð 21. februar beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Ivan Johannesen, landsstýrismann, og fingið upplýsingar um láni-treytir, og hvat peningurin skal nýtast til.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiri-luta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Anfinn Kallsberg, Jógvan Durhuus, Heini O. Heinesen, Eilif Samuelsen og Flemming Mikkelsen) heldur tað verða rætt at umfíggja dýrar kredittir við bíligari lánum. Landsstýrið eigur at hava neyvt eftirlit við heimtskuni av hesum peningi og tryggja sær, at hann kemur samfelagnum til gagns og undir ongum umstøðum fer út aftur í øktum almennum ella privatum forbrúki.

Sostatt setir meirilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Sum nýggj § 2 verður sett:
"Partar av hesum láni skulu nýtast til:
Afturgjaldan av obligatiónsláni 1/7-90,
Afturgjaldan av kassakredittum í føroyskum bankum vegna avlops-

1) Som ny § 2 indsættes:
"Dele af dette lån skal anvendes til:
Tilbagebetaling af obligationslån 1/7-90,
Tilbagebetaling af kassekreditter i færøske i færøske banker i tilknytning til overskuds-

skattin fyri 1987,
Afturgjaldan av byggikreditti í Handilsbankanum og
Niðurgjaldan av kreditti í Nationalbankanum,
og í landskassans likviditet.

2) § 2 verður § 3.

skatten for 1987,
Tilbagebetaling af byggekredit i Handelsbanken
og
Nedbringelse af kredit i Nationalbanken,
og i landskassens likviditet.

2) § 2 bliver § 3.

Soleiðis broytt mælir meirilutin løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Jørgen Thomsen) vísir á, at Javnaðarflokkurin ásannar, at ein ávís lántøka gerst neyðug, tí er tað umráðandi, at ein neyv meting verður gjørd hesum viðvíkjandi, men at tað er sera torført fyri ikki at siga heilt vónleyst at viðgera allar teir spurningar, ið taka seg upp í samband við eina lántøku sum hesa til føroyska landskassan.

Tað tilfar, sum er lagt fyri tingið saman við hesum máli, er lítið ella einki. Talan er bert um smáar viðmerkingar og ongar veruligar upplýsingar.

Á fundi í fíggjarnevndini var heldur ikki møguligt at fáa nøktandi upplýsingar soleiðis, at minnilutin kann taka støðu.

Tað liggur á ljóði, at landskassin umframt hesa lántøku eisini skal taka lán til Kúsalánsgrunnin, alivinnuna og endurfígging av fiskiskipaflotanum.

Minnilutin kann ikki góðkenna mannagongdina í samband við viðgerðina av hesum máli.

Málið varð framlagt 16. februar 1990 og kom til fyrstu viðgerð 21. í sama mánað.

Á fundi í fíggjarnevndini, ið hildin varð beint eftir viðgerðina á tingi, varð sagt, at fíggjarnevndin skuldi hava álitið greitt til framløgu longu í dag 22. februar.

Tá ið minnilutin ikki heldur seg fáa nóg mikið av tíð ei heldur nóg mikið av upplýsingum í samband við eina lántøku til landskassan upp á 650 mió. kr., ber illa til at luttaka í viðgerðini.

Minnilutin hevur heldur ikki fingið eyga á, hvørjar politiskar ætlanir liggja aftanfyri hesar lántøkur, og ti kennir flokkurin seg ótryggan við støðuna.

Út frá hesum viðmerkingum kann Javnaðarflokkurin ikki taka undir við fyriliggjandi uppskoti og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) vísir á, at hetta stórmál at geva landsstýrinum heimild at taka lán stórt kr. 650 mió. ikki hevur fingið ta viðgerð í fíggjarnevndini, sum tað av sonnum hevur uppiborið.

Tað má metast ábyrgdarleyst, at mál av hesum slagi á henda hátt verður trokað ígjegnum, soleiðis sum samgongumeirilutin hevur ætlanir um.

Hóast tingskipanin sigur greitt frá vanligari mannagongd og harvið tryggjar øllum málum rúma tíð til viðgerðar, so verður meginreglan skúgvað til síðis og andstøðan soleiðis eisini skerd, ið hvussu so er fyri sín part, at geva hesum stórmáli eina veruliga viðgerð.

Minnilutin tekur til eftirtektar, at likviditetur landskassans er vánaligur, men kennir seg ikki tryggan við, hvussu ætlaða lántøka skal nýtast.

Upplýst hevur m.a. verið, at 100 mió. kr. skulu nýtast til afturrindan av einum kassakreditti, ið tikin varð í 1986 í samband við afturrindan av avlopsskatti fyri 1987.

Tað undrar minnilutan, at neyðugt hevur verið hjá landsstýrinum í 1988 at trekkja upp á nakran kassakredit í nevnda tíðarskeiði. Hetta var jú tann tíðin, tá óført varð reypað um, at grunnarnir stóðu at bresta og landskassin floymdi í peningi. Eitt er at ivast í, at slíkt eisini undrar skattgjaldaran, og fær hann at standa spyrjandi!

Eisini hevur verið upplýst, at 100 mió. kr. skulu nýtast til niðurgjalding av kreditti í tjóðbankanum, 150 mió. kr. til veðhaldsútlegg í føroyskum bankum, 80 mió. kr. sum skuld

til oljugrunnin og 60 mió. kr. til byggikreditt í Handilsbankanum í samband við Heygadrang.

Minnilutin hevur varnast, at undir "viðgerðini" í fíggjarnevndini hevur áherðsla verið løgd á, at so lítið sum gjørligt av umtalaða láni eigur at fara út í umfar í tí føroyska samfelagnum.

Hetta er at undrast yvir, serliga tá hugsað verður um, at høvuðsorsøkin til, at likviditetur landskassans er so út av lagi vánaligur, skyldast teim tiltøkum, sum samgongan fyri tíð síðan setti í verk.

Avleiðingarnar av hesum hava sum kunnugt verið lækkandi inntøkur til landkassan, umframt tað støðugt vaksandi arbeiðsloysið við svárum sosialum og menniskjaligum avleiðingum, sum nú av álvara ger seg galdandi kring oyggjar okkara. So tað, sum nú sæst er einki annað enn symptomir uppá sjúku, ið rættiliga tók til, tá landsstýrið setti síni alt, alt ov hørðu tiltøk í verk.

Tí hevði tað verið rætt, at peningur í samband við umtalaðu lántøku í stóran mun varð nýttur til arbeiði kring landið soleiðis, at arbeiðsmøguleikar til allar arbeiðsførar føroyskar hendur aftur vórðu tøkir, og vit fingu bøtt um skaðan, ið longu hevur rakt manga familju kring landi meint.

Undir 1. viðgerð varð m.a. upplýst, at henda lántøka "bert er ein byrjan av lántøkum framyvir".

Nevnt hevur verið einar 200-300 mió.kr. til fiskivinnuna, tleiri hundrað mió. kr. til alivinnuna, og somuleiðis hevur ljóða, at hundraðtals mió. kr. fóru at verða veittar Húsalánsgrunninum.

Undir "viðgerðini" í fíggjarnevndini hevur undirritaði reist spurningin og fregnast, hvørjar ætlanir vóru frá landsstýrisins síðu hesum viðvíkjandi. Hetta varð gjørt við tí grundgeving, at vita undir hvørjum "lánikarmi" landsstýrið ætlar sær at virka undir framyvir.

Eingin nágreinilig ætlan frá landsstýrisins síðu fyriliggur, so óvist er, um samlaða lániupphædd landskassans í hesum skeiði bert fer at verða hesar 650 mió. kr. alla talan verður um eina upphædd, sum nærkast tveimum milliardum krónum. Hvørja ávirkan hett kemur at hava á uttanlandsskuldina er ikki

torført at meta um.

Tá minnilutin ikki hevur fingið trygd fyri, hvussu stórur partur av hesum láni skal nýtast sum "regulator" til arbeiðsskapandi tiltøk, verður sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum alt fyri eitt at seta neyðug arbeiðsskapandi tiltøk í verk, sum fyribyrgja og koma nívandi arbeiðsloysinum kring landið til lívs.

FÍGGJARNEVNDIN 9. mars 1990.

Anfinn Kallsberg — Heini O. Heinesen — Jógvan Durhuus

Flemming Mikkelsen — Eilif Samuelsen — Jørgen Thomsen

Tordur J. Niclasen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

Tlf. 11080 . Telex 81310 lingms fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15. Leygardag stongt

20. februar 1990

F. L. j. nr. 1212-14-1
Í at tiskila í svari

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 79/89: Broyting í løgtingslóg um menningargrunn.

Uppskot

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri íðnað, handverk og tænastufyritøkur.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 um menningargrunn fyri íðnað, handverk og tænastufyritøkur verður § 3 orðað soleiðis:

"5 limir og 5 tiltakslimir eru í nevnd grunsins. Løgtingið velur 4 limir og 4 tiltakslimir. Landsstýrið velur 1 lim, sum er formaður, og ein tiltakslim. Limir og tiltakslimir verða valdir, tá

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udviklingsfond for industri, håndværk og servicevirksomheder.

§ 1.

I lagtingslov nr. 37 af 26. juni 1973 om udviklingsfond for industri, håndværk og servicevirksomheder affattes § 3 således:

"Fondens bestyrelse har 5 medlemmer og 5 suppleanter. Lagtinget vælger 4 medlemmer og 4 suppleanter. Landsstyret vælger 1 medlem, som er formand, og 1 suppleant. Medlemmerne og suppleanterne

nýtt landsstýrið er skipað aftan á hvørt løgtingsval, tó fyrstu ferð tá henda lóg kemur í gildi."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

vælges, når der er dannet landsstyre efter hvert lagtingsvalg, dog første gang når denne lov træder i kraft."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur fyrr lagt uppskot fyri tingið um at broyta nevndarsamansetingina hjá Menningargrunni Íðnaðarins. Uppskotið tá vann ikki frama og kom ikki til endaliga viðgerð.

Menningarstovan hevur nú tikið spurningin upp aftur í skrivi til landsstýrið og viðgerð eisini spurningin um nevndarsamansetingina hjá Íðnaðargrunninum.

Menningarstovan heldur, at bæði landsstýrið og løgtingið áttu at umhugsa av nýggjum, hvussu nevnd grunnsins verður vald, nú umsitingin er komin í fasta legu. Hildið verður eisini, at skipanin natúrliga kundi verið tann sama sum fyri Føroya Íðnaðargrunn.

Íðnaðargrunnurin hevur fimm nevndarlimir, sum allir verða valdir av landsstýrinum.

Nevnd menningargrunnsins hevur higartil verið vald av Løgtinginum.

Landsstýrið skjýtur við hesum upp, at nevndin í Menningargrunninum verður fimm limir, og at teir fýra verða valdir av tinginum, meðan tann fimti, sum skal verða formaður, verður valdur av

landsstýrinum.

Valið fer fram tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval, tó fyrstu ferð, tá hendan lóg kemur í gildi.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/ Kjartan Hoydal

A l i t

i

løgtingsmáli nr. 79/1989: Broyting i løgtingslóg um menningargrunn.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 20. februar 1990 og eftir 1. viðgerð 22. februar beint í iðnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Edmund Joensen, Poul Michelsen og Heini O. Heinesen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Vilhelm Johannesen) kann ikki taka undir við at nevndin í menningargrunninum verður víkað úr trimum uppí tímm limir.

Í tveimum førum hevur undirritaði verið landsstýrismaður í iðnaðarmálum í tilsamans gott og væl fimm ár. Hesi bæði tíðarskeiðini gjørdi nevndin í menningargrunninum eitt dygdargott arbeiði og minnilutin er als ikki sannførur um, at eitt stýri við fimm limum kemur at virka betur.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum er heldur eingin grundgeving - hvørki saklig ella ósaklig - fyri at víðka nevndina til fimm limir. Landsstýrið staðfestir at stýrið fyri iðnaðargrunnin telir fimm limir og heldir tað so verða náttúrligt at nevndin í menningargrunninum eisini telir fimm limir. Hvi ikki venda byttini og siga, at nevndin í menningargrunninum telir triggjar limir, og tí er tað náttúrligt at minka talið av stýrislimum í iðnaðargrunninum niðir í tryggjar?

Samgongan hevur sett sær fyri at spara, men hvar er sparingin, tá landsstýrið mælir til at víðka nevndina í menningargrunninum úr trimum uppí fimm limir og talið av ráðslimum í Føroya Jarðaráð somuleiðis úr trimum uppí fimm? Hvar er logikkurin tá landsstýrið um somu tíð hevur lagt eitt uppskot fram á ting um at minka talið av limum í ferðamannaráðnum úr sjey niður í triggjar? Minnilutin ásannar at tilvildin ræður og hevur allar bestu gróðrarlíkindi í hesum

døgum.

Javnaðarflokkurin sær onga ørsøk til at hækka talið av limum í nevndini fyri menningargrunnin. Flokkurin kann tí ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins og minnilutin setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) heldur ikki tann størsti trupuleikin hjá Menningargrunninum vera talið av nevndarlimum, sum landsstýrið skjýtur upp at broyta úr 3 til 5 á sama hátt, sum landsstýrið hevur økt um stjórastørvini í Tinganesi, talið av nevndarlimum í "Atlants Flog", og nú ætlar at økja um talið á nevndarlimum í Jarðarráðnum úr 3 til 5.

Nakra sparing á almenna økinum er ringt at fáa eyga á, men maðurin á gøtuni noyðist at gjalda landskassanum meira í tolli, skatti og bundnari samansparing og hevur tí ilt við at fáa endarnar at røkka saman.

Heldur átti landsstýrið at komið við uppskoti um at útvega Menningargrunninum orku til at verða við til at fíggja framleiðslu, sum kann minka um arbeiðaloysi, økja um útflutning okkara og menna virksemi í bygd og býr.

Tí loyvir minnilutin sær at seta fram soljóðandi

uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at útvega Menningargrunninum fíggjarorku til at stuðla framleiðslu, ið kann minka um arbeiðsloysi, økja um útflutningin og menna virksemi í bygd og býr.

ÍDNAÐARNEVNDIN, 25. mai 1990.

Heini O. Heinesen Vilhelm Johannesen John Petersen

Niels Pauli Danielsen Edmund Joensen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11050 Telex 81310 tingrs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

20. februar 1990

F. L. j. nr. 1700-9
(at tilskila á svarið)

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 80/89: Broyting í løgtingslóg um landsjørð.

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsjørð.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 59 frá 9. juni 1988 um landsjørð verður § 3 orðað soleiðis:
"5 limir og 5 tiltakslimir eru í nevnd grunsins. Løgtingið velur 4 limir og 4 tiltakslimir. Landsstýrið velur 1 lim, sum er formaður, og ein tiltakslim. Limir og tiltakslimir verða valdir, tá nýtt landsstýrið er skipað aftan á hvørt løgtingsval, tó fyrstu ferð tá henda lóg kemur í gildi."

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsjord.

§ 1.

I lagtingslov nr. 59 af 9. juni 1988 om landsjord affatt § 3 således:
"Fondens bestyrelse har 5 medlemmer og 5 suppleanter. Lagtinget vælger 4 medlemmer og 4 suppleanter. Landsstyret vælger 1 medlem, som er formand, og 1 suppleant. Medlemmerne og suppleanterne vælges, når der er dannet landsstyre efter hvert lagtingsvalg, dog første gang når denne lov træder i kraft."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar:

Núverandi Jarðarráð hevur 3 limir, har Búnaðarfelagið valdi ein, meðan Landsstýrið valdi tveir, harav annar var formaður.

Jarðarlógin sum samtykt varð í 1988 ásitur, at Løgtingið velur allar tríggjar limirnar. Ráðið er ongartíð valt eftir nýggju lógini.

Í samband við, at nevndir í øðrum grunnum verða umskipaðar, til dømis Menningargrunnurin, sum eisini er stórur lánistovnur, hevur landsstýrið viðgjort skipanina av Jarðarráðnum av nýggjum.

Landsstýrið hevur avgjørt at skjóta upp, at Jarðarráðið fær 5 limir og at fýra verða valdir av Løgtinginum, meðan hin fimti, sum skal vera formaður, verður valdur av Landsstýrinum.

Valið fer fram tá nýtt landsstýri verður skipað eftana hvørt løgtingsval, tó fyrstu ferð, tá hendan lóg kemur í gildi.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/ Kjartan Hoydal

Á l í t

í

løgtingsmáli nr. 80/1989: Broyting í løgtingslóg um landsjørð.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 20. februar 1990 og eftir 1. viðgerð 7. mars beint í landbúnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minniluta.

Meirilutin (Jógvan Durhuus, Jákup Lamhauge og John Petersen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) heldur eitki vera í vegin fyri, at ráðið verður víðkað við 2 limum, men heldur tað vera skilabest, at tingið velur allar fimm, og at nevndin skipar seg sjálv og ikki, sum skotið verður upp, at landsstýrið velur formannin.

At allir fimm verða valdir av løgtinginum tryggjar, at býtið av limum til samgongu/andstøðu til eina og hvørja tíð verður ávikavis 3/2, og má hetta metast meira demokratiskt enn uppskot landsstýrisins, sum gevur samgonguni heilar 4 av 5 limum.

Samsvarandi hesum setir minnilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður aftan á ordini: "nevnd grunsins" sett: "Løgtingið velur 5 limir og 5 tiltakslimir. Nevndin skipar seg sjálv."	I § 1 indsættes efter ordene: "fondens bestyrelse": "Lagtinget vælger 5 medlemmer og 5 suppleanter. Bestyrelsen konstituerer sig selv."

Minnilutin (Henrik Old) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins um at økja talið av limum í jarðarráðnum frá 3 til 5 limum bert við tí grundgeving, at landsstýrið er í ferð við at økja um talið av limum í øðrum nevndum eisini.

Tað eru bert tvey ár síðani, at løgtingið viðtók nýggja løgtingslóg um landsjørð.

Eftir gomlu skipanini skuldi landsstýrið velja 2 limir og Búnaðarfelagið 1. Landsstýrið skuldi velja formann millum hesar triggjar.

Eftir nýggju lógini frá 1988 skal løgtingið velja allar tríggjar, og landsstýrið skal velja formann millum hesar tríggjar.

Hetta var eftir ynski frá Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum í landbúnaðarnevndini. Eftir stuttari tíð hava hesir broytt støðu, og kann tað ikki vera onnur orsøk enn, at trupult er at fáa politiska býtið av nevndarsessum at ganga upp.

Tí tekur minnilutin ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men skjýtur upp, at valt verður eftir galdandi lóg.

LANDBÚNAÐARNEVNDIN, 28. mai 1990.

Jógvan Durhuus Jákup Lamhauge John Petersen

Henrik Old Tordur Niclasen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 6. mars 1990

F. L. j. nr.
(at tiskila í svari)

Sími 11000 - Telex 81310 tinghs fa - Telefax 14942 - Postboks 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

PJ/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 31/1989: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um Áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður henda broyting gjørd:	I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændring:
Í § 3, stk. 2 verða 2. og 3. pkt. strikað.	I § 3, stk. 2 udgår 2. og 3. pkt.
§ 3, stk. 2, 4. pkt. verður hereftir § 3, stk. 2, 2. pkt.	§ 3, stk. 2, 4. pkt. bliver herefter § 3, stk. 2, 2. pkt.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1990.	Denne lov træder i kraft den 1. januar 1990.

Vanligar viðmerkingar:

Uppskot landsstýrisins er eitt av 4 lógaruppskotum, sum verða løgd fyri løgtingið.

Lógaruppskotini viðgera ta skattligu støðuna hjá pensjónistum v.m.

Endamálið við hesum lógarbroytingum er at broyta skattingina hjá pensjónistum v.m. soleiðis, at hesi fáa betri møguleikar fyri at hava lønandi arbeiði.

Uppskotini eru í stuttum hesi:

A. Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av [illegible] til landskassan verður skotið upp at broyta § 3 [illegible] at pensjónistar v.m., sum í dag fáa ein hægri persónsfrádrátt enn aðrir persónar, frá 1. januar 1990 og framyvir fáa rætt til tann fyri aðrar persónar galdandi vanliga persónsfrádráttin, sum í dag er 4.500 kr. Hesin frádráttur er sum kunnugt í tí útroknaða landsskattinum.

B. Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunusk[illegible] verður skotið upp at veita pensjónistum v.m. ein serligan pensjónistafrádrátt svarandi til fólkapensjónsgrundupphæddina. Hesin frádráttur verður í tí skattskyldugu inntøkuni.

Umleggingin kostar uml. 33 mió. kr. Av hesum missir landskassin uml. eina hálva mió. kr. og kommunurnar uml. 32 mió. kr. og kirkjuskatturin minkar við eini hálvari mió. kr. Útrokningin er gjørd út frá sjálvuppgávuni 1988. Í hesi meting er ikki íroknað meirskatturin av, at pensiónistar fara at hava meira lønandi arbeiði.

C. Fyri at kommunurnar ikki skulu missa hesar inntøkur, setir landsstýrið fram eitt lógaruppskot um, at kommunurnar fáa endurrindað úr landskassanum eina ávísa upphædd uppá 4.500 kr. fyri hvønn pensjónist v.m., sum er búsitandi í kommununi hin 1. juli.

D. Skotið verður eisini upp at avtaka løgtingslóg nr. 110 um

serviðbót til ávísar pensjónistar. Sum fyrr nevnt kostar umleggingin uml. 33 mió. kr. Í hesi meting er ikki íroknað tann sparing, sum kemst av, at løgtingslóg nr. 110 frá 3. oktober 1988 um serviðbót til ávísar pensjónistar verður avtikin.

Serligar viðmerkingar.

Hetta lógaruppskotið ber í sær, at tann hægri pensjónsfrádrátturin fyri pensjónistar v.m. fellur burtur.

Pensjónistar v.m. fáa hereftir sama persónsfrádrátt sum aðrir skattgjaldarar, men samstundis verður skotið upp at veita pensjónistum v.m. ein serligan pensjónistafrádrátt í tí skattskyldugu inntøkuni.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/Jálgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 81/1989: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 7. mars 1990 og eftir 1. viðgerð 9. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen og Jákup Lamhauge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, tó við teirri broyting, at lógin má koma í gildi 1. januar 1991 í staðin fyri 1. januar 1990, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 2 verður verður orðað soleiðis:	§ 2 formuleres således:
"Henda lóg fær gildi 1. januar 1991".	"Denne lov træder i kraft 1. januar 1991".

Minniluti (Tórbjør Poulsen og Atli P. Dam) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og vísir til álitið í løgtingsmáli nr. 86/1989: Avtøka av løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensiónistar.

SKATTANEVNDIN, 25. mai 1990.

Jógvan við Keldu - Jákup Lamhauge - Heine O. Heinesen

Tórbjørn Poulsen - Atli P. Dam

Kristiligi Fólkaflokkurin.
Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur

Føroya løgting

løgtingsmál nr. 82/1989: Krígspensjón.

U p p s k o t
til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at seta niður nevnd at kanna krígspensjón í grannalondum okkara og koma við uppskoti um at fáa tílíka pensjón at galda eisini fyri sigling við føroyskum skipum.

Viðmerkingar:

Í grannalondum okkara táa fólk, ið sigldu undir krígnum, serliga pensjón, kallað krígspensjón.

Stórt tal av føroyingum tóku á seg tað vandafulla starv at sigla við fiski á bretska marknaðin undir krígnum, og tað sigst, at sjálvur Churchill í bretska undirhúsinum hevði tað á orði og segði, hetta ongantíð skuldi verða gloymt føroyingum.

Nógvir settu lívið til í hesari sigling, og teir vóru eisini, ið mistu heilsuna.

Stóran ágóða útvegaði henda sigling landi okkara, sum kundi verða við til at endurreisa og menna hin føroyska flotan í árunum, sum komu eftir krígslok.

Nógvir av teimum monnunum, sum sigldu krígsárini, og sum sluppu við lívinum, eru nú komnir í pensjónsaldur, og tað er ikki annað enn ríniligt, at landið veitir teimum og teirra eina pensjón á sama hátt sum í øðrum londum. Hugsað eigur her eisini at vera um tær kvinnur, sum gjørdust einkjur undir krígnum, og sum mangan sótu eftir við nógvum børnum og tungum húsi.

Tí verður hetta uppskot sett fram.

Á Føroya løgtingi, 21. februar 1990

Niels Pauli Danielsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

6. mars 1990

F. L. j. nr.
(as tilskal vera upgivi)

Tlf. 11080. Telex 81310 tingvs fa. Telefax 14942. Postbox 64
Afgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

PJ/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 83/1989: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í § 33 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verður sum nýtt nr. 13 sett:

"Hjá øllum fólkapensjónistum og øðrum persónum, sum hava fylt 67 ár, hjá persónum, sum fáa framskundaða fólkapensjón, avlamis- og einkjupensjón og persónum, sum fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, ein pensjónistafrádráttur. Fyri giftar persónar er frádrátturin tann sami sum fólkapensjónsgrunduppháddin fyri giftar persónar. Fyri stakar persónar er frádrátt-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I § 33 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat indsættes som nyt nr. 13:

"Hos alle folkepensionister og andre personer, som er fyldt 67 år, personer, som oppebærer førtids-, invalide- og enkepension, samt personer, der oppebærer hjælp i henhold til forsorgslovens § 13, et pensionistfradrag. For gifte personer udgør fradraget et beløb på størrelse med folkepensionens grundbeløb for gifte personer. For enlige personer udgør fra-

urin tann sami sum fólkapensjónsgrunduppheddin fyri stakar persónar. Til nýtslu fyri fyrisitingina av frádráttinum siga Almannastovan og aðrir almennir myndugleikar Líkningarráðnum frá, lutvíst um broytingar í fólkapensjónsgrunduppheddini, so skjótt hesar eru tøkar, lutvíst eitt yvirlit yvir teir í 1. pkt. nevndu persónar. Frádrátturin verður javnaður eftir grunduppheddini á fólkapensjónini pr. 1. oktober, sum galdandi fyri komandi inntøkuár."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1990.

draget et beløb på størrelse med folkepensionens grundbeløb for enlige personer. Til brug for administrationen af fradraget meddeler Almannastovan og andre offentlige myndigheder Ligningsrådet dels om ændringer i folkepensionens grundbeløb, så snart disse foreligger, dels en oversigt over de i 1. pkt. nævnte personer. Fradraget reguleres med folkepensionens grundbeløb pr. 1. oktober som gældende for det kommende indkomstår."

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. januar 1990.

Vanligar viðmerkingar:

Uppskot landsstýrisins er eitt av 4 lógaruppskotum, sum verða løgd fyri løgtingið.

Lógaruppskotini viðgera ta skattligu støðuna hjá pensjónistum v.m.

Endamálið við hesum lógarbroytingum er at broyta skattingina hjá pensjónistum v.m. soleiðis, at hesi fáa betri møguleikar fyri at hava lønandi arbeiði.

Uppskotini eru í stuttum hesi:

A. Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan verður skotið upp at broyta § 3 soleiðis, at pensjónistar v.m., sum í dag fáa ein hægri

persónsfrádrátt enn aðrir persónar, frá 1. januar 1990 og framyvir fáa rætt til tann fyri aðrar persónar galdandi vanliga persónsfrádráttin, sum í dag er 4.500 kr. Hesin frádráttur er sum kunnugt í ti útroknaða landsskattinum.

B. Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verður skotið upp at veita pensjónistum v.m. ein serligan pensjónistafrádrátt svarandi til fólkapensjónsgrundupphæddina. Hesin frádráttur verður í tí skattskyldugu inntøkuni.

Umleggingin kostar uml. 33 mió. kr. Av hesum missir landskassin uml. eina hálva mió. kr. og kommunurnar uml. 32 mió. kr. og kirkjuskatturin minkar við eini hálvari mió. kr. Útrokningin er gjørd út frá sjálvuppgávuni 1988. Í hesi meting er ikki íroknað meirskatturin av, at pensiónistar fara at nava meira lønandi arbeiði.

C. Fyri at kommunurnar ikki skulu missa hesar inntøkur, setir landsstýrið fram eitt lógaruppskot um, at kommunurnar fáa endurrindað úr landskassanum eina ávísa upphædd uppá 4.500 kr. fyri hvønn pensjónist v.m., sum er búsitandi í kommununi hin 1. juli.

D. Skotið verður eisini upp at avtaka løgtingslóg nr. 110 um serviðbót til ávísar pensjónistar. Sum fyrr nevnt kostar umleggingin uml. 33 mió. kr. Í hesi meting er ikki íroknað tann sparing, sum kemst av, at løgtingslóg nr. 110 frá 3. oktober 1988 um serviðbót til ávísar pensjónistar verður avtikin.

<u>Serligar viðmerkingar.</u>

Hetta lógaruppskotið ber í sær, at fólkapensjónistar v.m. fáa ein serligan pensjónistafrádrátt í tí skattskyldugu inntøkuni svarandi til fólkapensjónsgrundupphæddina.

Fyri giftar persónar er frádrátturin tann sami sum fólkapensjóns-

grunduppheddin fyri giftar persónar. Fyri stakar persónar er frádrátturin tann sami sum grunduppheddin fyri stakar persónar. Samstundis sum hesin pensjónistafrádrátturin verður innførdur, verður tann hægri persónsfrádrátturin fyri pensjónistar v.m. avtikin.

Í dag eru harumframt nakrar pensjónsviðbøtur skattafrían. Hetta verður ikki broytt. Løntakarafrádrátturin er í dag tann sami fyri pensjónistar sum fyri aðrar skattgjaldarar. Hetta verður heldur ikki broytt.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/Jalgrim Hilduberg

løgtingsmál nr. 83/1989: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 7. mars 1990 og eftir 1. viðgerð 9. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fundir við líkningarráðið, almannastovuna og landsstýrið.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í eitt meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen og Jákup Lamhauge) skjýtur upp at broyta § 29 í skattalógini soleiðis, at ein upphædd svarandi til fólkapensjónsgrunduppheddina verður skattafrí.

Hjá persónum, sum fáa framskundaða fólkapensjón, avlamis- og einkjupensjón, og persónum, sum fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, verður upphæddin skattafrí 1. januar árið eftir, at teir hava fylt 67 ár.

Omanfyri nevndu persónar fáa, inntil grunduppheddin teirra verður skattafrí, ein pensjonistafrádrátt svarandi til fólkapensjónsgrunduppheddina, sum skotið er upp í § 33.

Orsøkin til hesa broyting er, at nevndin metir, skattingina verða lættari at skilja hjá pensjónistum, um grunduppheddin verður skattafrí, enn um hon verður givin sum ein frádráttur. Hetta letur seg tó ikki gera fyri persónar, sum fáa framskundaða fólkapensjón, avlamis- og einkjupensjón og persónar, sum fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, uttan at hesir bliva lutfalsliga verri fyri. Tí verður skotið upp, at hesir persónar í staðin skulu hava ein pensjónistafrádrátt, og setir meirilutin tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 29 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verður nr. 13 orðað soleiðis: "ellisviðbót eftir 10. §, persónlig viðbót eftir 14. §, hjálpar-, røktar- og avlamisviðbót eftir 16. § og grundupphæddin sbrt. § 3 fyri persónar, ið hava fylt 67 ár eftir løgtingslóg nr. 58 frá 15. mars 1967 um fólkapensjón við seinni broytingum, smbr. tó 2. punktum. Grundupphæddin hjá persónum, ið fáa frádrátt sbrt. § 33, nr. 13, verður skattafrí árið eftir, at hesi eru fylt 67 ár. Avlamisgjøld eftir § 4, 2. stk., hjálpar- og røktarviðbót eftir 11. §, persónlig viðbót eftir § 15, avlamisveiting, hjálpar- og røktarviðbót hartil

I § 1 foretages følgende ændringer:

1) I § 29 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat formuleres nr. 13 således: "alderstillæg efter § 10, personligt tillæg efter § 14, bistands-, pleje- og invaliditetstillæg efter § 16 og grundbeløbet i henhold til § 3 for personer, der er fyldt 67 år efter lagtingslov nr. 58 af 15. marts 1967 om folkepension med senere ændringer, jfr. dog 2. punktum. Grundbeløbet for personer, der får fradrag efter § 33, nr. 13, er skattefrit året efter, at disse er fyldt 67 år. Invaliditetstillæg i henhold til § 4, 2. stk, bistands- og plejetillæg i henhold til § 11, personligt tillæg efter § 15, in-

eftir 16. §, veitingar eftir 31. § og 32. § og avlamisviðbót og hjálparviðbót eftir 45. § í lóg nr. 55 frá 15. mars 1967 um avlamispensjón v.m. við seinni broytingum og veitingar eftir § 9, § 15, § 16, § 17 og § 18 og persónligar viðbøtur eftir § 13 og § 29 í lóg nr. 56 frá 15. mars 1967 um almenna forsorg við seinni broytingum,

2) Í § 33 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verður nr. 13 orðað soleiðis:
"Hjá persónum, sum fáa framskundaða fólkapensjón, avlamis- og einkjupensjón og persónum, sum fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlóginni, eitt pensjónistafrádrátt ur. Fyri giftar persónar er frádrátturin tann sami sum fólkapensjónsgrunduppháddin fyri giftar persónar. Fyri stakar persónar er frádrátturin tann sami sum fólkapensjónsgrunduppháddin fyri stakar persónar. Til nýtslu fyri fyrisitingina av

validitetsydelse, bistands- og plejetillæg hertil efter § 16, ydelser efter § 31 og § 32 og invaliditetstillæg og bistandstillæg efter § 45 i lov nr. 55 af 15. marts 1967 om invalidepension m.v. med senere ændringer samt ydelser efter § 9, § 15, § 16, § 17 og § 18 og personlige tillæg efter § 13 og § 29 i lov nr. 56 af 15. marts 1967 om offentlig forsorg med senere ændringer,

2) I § 33 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskatt og kommuneskat formuleres nr. 13 således:
"For personer, der får fremskyndet folkepension, invalide- og enkepension og personer, der får hjælp efter § 13 i forsorgsloven, et pensionistfradrag. For gifte personer udgør fradraget et beløb på størrelse med folkepensionens grundbeløb for gifte personer. For enlige personer udgør fradraget et beløb på størrelse med folkepensionens grundbeløb. Til brug for

frádráttinum siga Almannastovan og aðrir almennir myndugleikar Líkningarráðnum frá, lutvíst um broytingar í fólkapensjónsgrunduppháddini, so skjótt hesar eru tøkar, lutvíst eitt yvirlit yvir teir í 1. pkt. nevndu persónar. Frádrátturin verður javnaður eftir grunduppháddini á fólkapensjónini pr. 1. oktober, sum galdandi fyri komandi inntøkuár."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1991.

administrationen af fradraget meddeler Almannastovan og andre offentlige myndigheder Ligningsrådet dels om ændringer i folkepensionens grundbeløb, så snart disse foreligger, dels en oversigt over de i 1. pkt. nævnte personer. Fradraget reguleres med folkepensionens grundbeløb pr. 1. oktober som gældende for det kommende indkomstår.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1991.

Minnilutin (Tórbjørn Poulsen og Atli P. Dam) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men vísir til álit sítt í løgtingsmáli nr. 86/1989: Avtøka av løgtingslóg um servicbót til ávísar pensiónistar.

SKATTANEVNDIN, 25. mai 1990.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080 . Telex 81310 lagma fa . Telefax 14941 . Postbox 64
Afgreiðslutíðir: Kl. 10—15, leygardag stongt

6. mars 1990

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari)

PJ/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 84/1989: Gjaldan úr landskassanum til kommunurnar í mun til talið á pensjónistum v.m.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um gjaldan úr landskassanum til kommunurnar í mun til talið á pensjónistum v.m.

§ 1.

Føroysku kommunurnar fáa árliga goldið úr landskassanum eina upphædd gjørda upp eftir talinum á persónum, sum fáa fólkapensjón og øðrum persónum, sum hava fylt 67 ár, persónum, sum fáa framskundaða fólkapensjón, avlamis- og einkjupensjón og persónar, sum fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, og sum eru búsitandi í viðkom-

lagtingslov om betaling fra landskassen til kommunerne i forhold til antallet af pensionister m.v.

§ 1.

De færøske kommuner får hvert år et beløb udbetalt fra landskassen opgjort efter antallet af personer, der modtager folkepension og andre personer, som er fyldt 67 år, personer, der oppebærer førtids-, invalide- og enkepension, samt personer, der oppebærer hjælp i henhold til forsorgslovens § 13, og som er bosiddende i ved-

andi kommunu hin 1. juli.
Stk. 2. Upphæddin verður útgoldin kommununum 1. apríl árið eftir inntøkuárið.

§ 2.
Upphæddin er 4.500 kr. fyri hvønn teirra í § 1, stk. 1 nevndu persónum.

§ 3.
Upphæddin nevnd í § 2 fyri 1990 verður útgoldin 1. apríl 1991.

§ 4.
Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1990.

kommende kommune den 1. juli.
Stk. 2. Beløbet udbetales til kommunerne 1. april året efter indkomståret.

§ 2.
Beløbet udgør 4.500 kr. for hver af de i § 1, stk. 1 nævnte personer.

§ 3.
Beløbet nævnt i § 2 for 1990 udbetales 1. april 1991.

§ 4.
Denne lov træder i kraft den 1. januar 1990.

Vanligar viðmerkingar:
Uppskot landsstýrisins er eitt av 4 lógaruppskotum, sum verða løgd fyri løgtingið.

Lógaruppskotini viðgera ta skattligu støðuna hjá pensjónistum v.m.

Endamálið við hesum lógarbroytingum er at broyta skattingina hjá pensjónistum v.m. soleiðis, at hesi fáa betri møguleikar fyri at hava lønandi arbeiði.

Uppskotini eru í stuttum hesi:

A. Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan verður skotið upp at broyta § 3 soleiðis, at pensjónistar v.m., sum í dag fáa ein hægri persónsfrádrátt enn aðrir persónar, frá 1. januar 1990 og framyvir fáa rætt til tann fyri aðrar persónar galdandi vanliga persónsfrádráttin, sum í dag er 4.500 kr. Hesin

frádráttur er sum kunnugt í tí útroknaða landsskattinum.

B. Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verður skotið upp at veita pensjónistum v.m. ein serligan pensjónistafrádrátt svarandi til fólkapensjónsgrundupphæddina. Hesin frádráttur verður í tí skattskyldugu inntøkuni.

Umleggingin kostar uml. 33 mió. kr. Av hesum missir landskassin uml. eina hálva mió. kr. og kommunurnar uml. 32 mió. kr. og kirkjuskatturin minkar við eini hálvari mió. kr. Útrokningin er gjørd út frá sjálvuppgávuni 1988. Í hesi meting er ikki íroknaður meirkostnaðurin av, at pensiónistar fara at hava meira lønandi arbeiði.

C. Fyri at kommunurnar ikki skulu missa hesar inntøkur, setir landsstýrið fram eitt lógaruppskot um, at kommunurnar fáa endurrindað úr landskassanum eina ávísa upphædd uppá 4.500 kr. fyri hvønn pensjónist v.m., sum er búsitandi í kommununi hin 1. juli.

D. Skotið verður eisini upp at avtaka løgtingslóg nr. 110 um serviðbót til ávísar pensjónistar. Sum fyrr nevnt kostar umleggingin uml. 33 mió. kr. Í hesi meting er ikki íroknað tann sparing, sum kemst av, at løgtingslóg nr. 110 frá 3. oktober 1988 um serviðbót til ávísar pensjónistar verður avtikin.

<u>Serligar viðmerkingar.</u>

Hetta lógaruppskot ber í sær, at kommunurnar árliga fáa endurrindað úr landskassanum eina upphædd uppá 4.500 kr. fyri hvønn pensjónist v.m., sum er búsitandi í kommununi hin 1. juli.

Sum fyrr nevnt missa kommunurnar uml. 32 mió. kr. við umleggingini av frádráttinum hjá pensjónistum v.m. Hetta lógaruppskot ber í sær, at kommunurnar fáa endurrindað uml. 30 mió. kr. árliga.

Við hesum lógaruppskoti verður galdandi býti, sum er ásett í reglunum í skattalógini millum landskassan og kommunurnar, ikki broytt.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/

Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 84/1989: Gjalden úr landskassanum til kommunurnar í mun til talið á persjónistum v.m.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 7. mars 1990 og eftir 1. viðgerð 9. mars beint í skattanevndina.

Ein samd nevnd mælir til at broyta § 1, stk. 2 í uppskoti landsstýrisins soleiðis, at útgjaldan verður mánaðarliga eftir útrokning ella sambært býtisskipan. § 3 fellur burtur. Nevndin mælir til at lógin fær gildi frá 1. januar 1991.

Sostatt setir ein samd skattanevnd fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) § 1. stk. 2 verður soljóðandi: "Upphæddin verður útgoldin mánaðarliga eftir útrokning ella sambært býtisskipan."	1) "§ 1, stk. 2 affattes således: "Beløbet udbetales månedlig efter foretagen udregning eller i henhold til fordelingsordning."
2) § 3 fellur burtur, og § 4 verður § 3.	2) § 3 udgår, og § 4 bliver § 3.
3) Í § 3 verður "1990" broytt til "1991".	3) I § 3 ændres "1990" til "1991".

SKATTANEVNDIN, 25. mai 1990.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heine O. Heinesen

Tórbjørn Poulsen Atli P. Dam

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 6. mars 1990

F. L. j. nr. 345-1-1

Tlf. 11080 . Telex 81310 lmstrs fa . Telefax 14941 . Postbox 64
Afgreiðslutíð: Kl. 10—15. ...

IG/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 85/1989: Keyp av hølum til Landsmiðstøð fyri undirvísingarambøð, Skúlabókagrunnin og Bókamiðsøluna.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um keyp av hølum til Landsmiðstøð fyri Undirvísingarambøð/Skúlabókagrunnin og Bókamiðsøluna.	lagtingslov om køb af lokaler til Landscentralen for undervisningsmaterialer/Skúlabókagrunnurin og Bókamiðsølan.
§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at keypa part av bygningunum matr. nr. 1315^{b} í Tórshavn fyri 22 mió. kr. og at taka upp lán til keypið.	§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe en del af bygningen matr. nr. 1315^{b} i Tórshavn for 22 mio. kr. og til at optage lån til købet.
§ 2. Landsstýrinum verður heimilað at nýta upp til 1,5 mió. kr. til umbygging og at taka upp lán til hetta endamál.	§ 2. Landsstyret bemyndiges til at anvende op til 1,5 mio. kr. til ombygning og at optage lån til dette formål.
§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur samtykt, at Landsmiðstøðin fyri undirvisingaramboð, Skúlabókagrunnurin og Bókamiðsølan verða løgd undir somu lon, soleiðis at samstarvið stovnanna millum gerst betri.

Til nevnda endamál hevur landsstýrið samtykt at keypa part av bygninginum matr. nr. 1315^{b} við Hoyvíksvegin, ið Húsalánsgrunnurin, Menningargrunnurin og Lønjavningargrunnurin í felag eiga.

Vísandi til samtykt í løgtingsmáli nr. 49/1986, har løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp tingingar um keyp av hølum matr. nr. 1315^{b} við Hoyvíksvegin frá Menningargrunninum at nýta m.a. til landsmiðstøð fyri undirvisingaramboð og vísandi til álit í løgtingsmáli nr. 10/1989: fíggjarløgtingslóg 1990, har fíggjarnevndin áleggur landsstýrinum at keypa miðhæddina í ognini hjá Grunnunum við Hoyvíksvegin til Landsmiðstøð fyri undirvisingaramboð verður við hesum løgd fyri tingið løgtingslóg um keyp av hølum til Landsmiðstøð fyri undirvisingaramvoð v.m.

Landsmiðstøðin flutti inn í hølini 1. september 1989. Leigan varð avtalað at vera 638.716 kr. árliga - hetta tó treytað av, at fíggjarnevndin góðkendi hædi leigumálið og prisin. Sum áður sagt hevur fíggjarnevndin ikki góðkent leigumálið, men ístaðin álagt landsstýrinum at keypa hølini. Grunnarnir eru, aftaná samráðingar við landsstýrið, samdir um at selja part av bygninginum, t.e. miðhæddina 1500 m^{2}, og o.u. 1/3 av kjallarahæddini, sum er goymsla 200 m^{2}, fyri 22 mió. kr. - í hesa upphædd er roknað leiga fyri ta tíðina, landsmiðstøðin hevur nýtt hølini uttan at gjalda fyri tað.

Ætlanin er at Skúlabókagrunnurin skal nýta miðhæddina, uml. 500 m^{2}. Hesi høli eru ikki innrættað (DANICA KØKAR hevur áður nýtt hesi høli), og landsstýrið heldur, at umbygginqin fer at kosta umi 1,5 mió. kr. Grunnarnir hava innrættað høli til Landsmiðstøðina.

Kjallarin, uml. 200 m^2, verður fyri það nesta nýttur til bókageymslu.

Fermetraprísurin fyri hølini verður sostatt 12.941,13 kr. (uttan umbygging) og 13.823,91 kr. (við umbygging).

Signar Hansen
landsstýrismaður

/ Súsanna Danielsen

løgtingsmáli nr. 8§ um undirvísingaramboð.

um keyp av hølum til Landsmiðstøð fyri ábókagrunnin og Bókamiðsøluna.

Málið er frá gt av landsstýrinum tann 7. mars 1990 og eftir 1. viðgerð 16. mars beint á fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, sum er í tráð við fíggjarlógina fyri 1990.

Meirilutin minnir landsstýrið á viðtøkur landsstýrisins um keyp av allari ognini matr. nr. 1315b í Tórshavn.

Út frá hesum mælir meirilutin (Anfinn Kallsberg, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Jógvan Durhuus og Heine O. Heinesen) løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Jørgen Thomsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein minniluti (Tordur J. Niclasen) førir fram:

Tá fíggjarlógin 1990 var til 1. viðgerð, vísti minnilutin á tann ójavna, sum gjørdur varð í sambond við sparingar á teimum ymisku greinunum. Meðan t.d. heilsuverkið og almannaverkið nærum fingu mønusting, vóru konti á Menta- og skúlaøkinum friðhalgað - ja, en tá var nærum einki mark fyri hvussu ávísar konti, sum tjóveldisflokkurin umsitur, vóru lívgaðar. Av teimum mongu kann m.a. her nevnast Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð, sum vaks við heilum 2,825 mió. kr. frá 1988 til 1990 ella við heilum kr. 1,422 mió. í mun til 1989. Sostatt gjørdist upphæddin fyri 1990 kr. 4,1 mió. í mun til kr. 1,275 mió. fyri árið 1988.

Í hesum døgum, har verkamaðurin serliga kennir sviðan av førda politikki samgongunnar, har nívandi arbeiðsloysi rakar manga familju kring landið, har fiskivinna og vinnulívið

hýkur á knøum - og tann sosiala armóðin støðugt veksur, er tað at landsstýrið enn einaferð skammiliga ætlar at lívga nøkrum partin av skúlaøkinum við tí grundgeving, at samstarvið millum skúlabókagrunnin, bókamiðsøluna og landsmiðstøðina fyri undirvísingarambod skal gerast betri.

Rokningin sum verður send skattgjalderinum fyri hetta "samstarvsfremjandi pedagogiska flipp", er heilar 30 mió. kr., tá ið avtornar ella 200 arbeiðsmannalønir eitt ár.

Verður øll ognin keypt soleiðis sum meirilutin mannir landsstýrið á at gera, verður útreiðslan helst einar 60 mió. kr. ella svarandi til 400 arbeiðsmannalønir árliga.

Minnilutin er av teirri áskoðan at tað er bæði ábyrgdarleyst og skammiligt í hesum døgum at keypa umtaleða matr. nr. til umtalaðu endamál og kann tí ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Heldur átti peningurin til ætlaða keyp at verið nýttur til arbeiðsskapandi tiltøk kring landið, og verður tí sett fram soloðandi

I Uppskot

til

samtykt

Álagt verður landsstýrinum at sleppa ætlanini viðv. keypi av høli til undirvísingarambod og í staðin nýta tær umleið 30 mió. kr. til arbeiðsskapandi virksemi kring landið.

Í samband við matr. nr. 1315b við Hoyvíksvegin er upplýst, at her húsast Húsalánsgrunnurin, Menningargrunnurin og Lønjavningargrunnurin.

Áður hevur verið uppá tal, at Lønjavningargrunnurin skuldi flytast út á bygd, men er tíanverri eingin miðspjaðing sett í verk á hesum øki og verður tí sett fram soljóðandi

II Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum, at taka neyðug stig til, at flyta Lønjavningargrunnin inn í Eysturoynna ella vestur í Vágar.

FÍGGJARNEVNDIN, 21. mai 1990.

Anfinn Kallsberg | Flemming Mikkelsen | Heine O. Heinesen

Eilif Samuelsen | Jørgen Thomsen | Jógvan Durhuus

Tordur Niclasen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 6. mars 1990 F. L. j. nr. 1010-35

TF. 11560 . Telex 81310 logms fa . Telefax 14941 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. Ikrýstrað vtoget

NF/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 86/1989: Avtøka av løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensiónistar.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensiónistar.	lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om særtillæg til visse pensionister.
§ 1. Løgtingslóg nr. 110 frá 3. oktober 1988 um serviðbót til ávisar pensiónistar verður sett úr gildi.	§ 1. Lagtingslov nr. 110 af 3. oktober 1988 om særtillæg til visse pensionister ophæves.
§ 2. Henda lóg fer gildi 1. mars 1990.	§ 2. Denne lov træder i kraft 1. marts 1990.

Viðmerkingar:

Í staðin fyri reglurnar um, at pensiónistar kunnu arbeiða fyri upp til 50.000 kr. áðrenn serviðbøturnar minka, kemur landsstýrið við uppskoti um, at sjálvar fólkapensiónsgrundupphæddirnar verða skattafríar. Hesar reglur koma at umfata allar pensiónistar, meðan áður galdandi reglur bert umfatað nakrar, nevniliga teir, sum fingu serviðbót.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til løgtingsmál nr. 81/1989: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan, nr. 84/1989: Gjaldan úr landskassanum til kommunurnar í

mun til talið av pensiónistum v.m. og nr. 33/1989: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/

Jalgrið Hilduberg

løgtingsmáli nr. 36/1989: Avtøka av løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensiónistar.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 7. mars 1990 og eftir 1. viðgerð 9. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen og Jákup Lamhauge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, tó við teirri broyting, at lógin má koma í gildi 1. januar 1991 í staðin fyri 1. mars 1990, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 2 verður orðað soleiðis:	§ 2 formuleres således:
"Henda lóg fær gildi 1. januar 1991."	"Denne lov træder i kraft 1. januar 1991."

Minniluti (Tórbjørn Poulsen og Atli P. Dam) hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotini frá landsstýrinum um broytingar í skattinum hjá pensjónistum v.m.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotini verður sagt, at endamálið við lógarbroytingunum er at broyta skattingina hjá pensjónistum v.m. soleiðis, at hesir fáa betri møguleikar fyri at hava lønandi arbeiði.

Henda ætlan landsstýrisins er bert í ávísan mun eydnast við fyriliggjandi lógarbroytingum.

Pensjónistar við einans lítlari oykainntøku verða ikki stórt øðrvisi fyri enn frammanundan. Nakrir, eitt nú einligir pensjónistar undir 67 ár, verða munandi verri fyri. Teir pensjónistar, sum fara at merkja broytingarnar, so tað munar, eru pensjónistar, sum hava eina góða inntøku frammihjá - større inntøka, jú større fyrimunur. Sama er sjálvandi eisini galdandi, um talan er ikki um inntøku, sum stendst av lønandi arbeiði, men inntøku eitt nú av privatari pensjón.

Lat okkum taka eitt dømi.

Einligur fólkapensjónistur, 67 ár, búsitandi í Tórshavnar Kommunu. Hann hevur eina lønarinntøku upp á kr. 142.600,- umframt fólkapensjónina kr. 43.284,- árliga at liva av. Hesin skal sambært galdandi lóg í skatti av við kr. 66.731. Eftir lógarbroytingum landsstýrisins sleppur hann víð kr. 53.753. Fyrimunurin í hesum føri er kr. 12.978 árliga.

Tað er væl skiljandi, at umleggingin av skattinum hjá pensjónistum komur at kosta, sambært útrokning landsstýrisins kr. 33 mió. - her er ikki íroknað tann sparing, sum stendst av, at løgtingslóg nr. 110 frá 3. oktober 1988 um serviðbót til ávísar pensjónistar, einar kr. 11,5 mió., verður avtikin.

Sum kunnugt er tann regla galdandi, at tað, sum nakrir skattgjaldarar sleppa lættari, mega aðrir gjalda meiri, og sum ikki einaferð verður tað at ganga út yvir meðal- og láginntøkurnar.

Minnilutin finnur onga orsøk at taka áðurnevndu løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensjónistar av. Sambært hesa lóg hevur pensjónistur møguleika at arbeiða fyri upp til kr. 53.000 uttan at missa serviðbøturnar. Henda skipan hevur riggað væl, og hevur elvt mongum pensjónisti at hava lønandi inntøku framíhjá.

Minnilutin setir tískil einki uppskot fram.

SKATTANEVNDIN, 25. mai 1990.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heino O. Heinesen

Tórbjørn Poulsen Atli P. Dam

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

9. mars 1990

T.f. 11080. Telex 81310 finens fa. Telefax 14944 Postbox 64
Arbeiðstíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

JH/pp

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari)

Føroya Løgting

Løgtingsmál nr. 87/1989: Broytingar í ymsum lógum um landskassaveðhald.

Uppskot

til

løgtingslóg um broytingar í ymsum lógum um landskassaveðhald.

§ 1.

1. Í løgtingslóg nr. 102 frá 19. august 1988 um endurnýggjing av fiskiskipaflotanum við seinni broyting verður innsett sum nýggj:
"§ 13A. Veðhald eftir hesi lóg verður veitt sum einfalt veðhald. Í serligum førum kann tó sjálvskuldaraábyrgd veitast fyri útlendskum prioritetslánum."
2. Í løgtingslóg nr. 15 frá 31. mars 1966 um stuðul til bygging av farmaskipum við seinni broytingum

lagtingslov om ændringer i forskellige love om landskassegaranti.

§ 1.

1. I lagtingslov nr. 102 af 19. august 1988 om fornyelse af fiskerflåden med senere ændring indsættes som ny:
"§ 13 A. Garanti efter denne lov ydes som simpel kaution. I særlige tilfælde kan der dog ydes selvskyldnerkaution for udenlandske prioritetslån."
2. I lagtingslov nr. 15 af 31. marts 1966 om støtte til bygning af fragtskibe med senere ændringer indsættes som ny:

verður innsett sum nýggj:
"§ 4 A. Veðhald eftir hesi lóg verður veitt sum einfalt veðhald. Í serligum førum kann tó sjálvskuldaraábyrgd veitast fyri útlendskum prioritetslánum."

3. Í løgtingslóg nr. 35 frá 20. mai 1988 um veðhald fyri lánum til frysti- og flakavirkir verður sett sum nýggj:
"§ 2 A. Veðhald eftir hesi lóg verður veitt sum einfalt veðhald".

4. Í løgtingslóg nr. 37 frá 18. september 1980 um veðhald fyri láni til keyp av bussum til koyring í ávísum rutum, verður í § 1 sett sum:
"stk. 2. Veðhald eftir hesi lóg verður veitt sum einfalt veðhald."

"§ 4 A. Garanti efter denne lov ydes som simpel kaution. I særlige tilfælde kan dog selvskyldnerkaution ydes for udenlandske prioritetslån."

3. I lagtingslov nr. 35 af 20. maj 1988 om garanti for lån til fryse- og filétanlæg indsættes som ny:
"§ 2 A. Garanti efter denne lov ydes som simpel kaution."

4. I lagtingslov nr. 37 af 18. september 1980 om garanti for lån til køb af busser til kørsel i visse ruter tilføjes i § 1 som:
"Stk. 2. Garanti efter denne lov ydes som simpel kaution."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Lógin ávirkar ikki givnar tilsagnir.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelsen.
Stk. 2. Loven påvirker ikke givne tilsagn.

Viðmerkingar:

Eftir galdandi mannagongd hava veðhald fyri lánum, sum landsstýrið landskassans vegna hevur veitt, altíð verið veitt sum sjálvskuldaraábyrgd, sjálvt um lógirnar ikki fordáðu fyri, at veðhald varð veitt sum einfalt veðhald.

Í seinastu lógini um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu, er tó sett beinleiðis í lógina, at veðhaldið skal vera einfalt.

Tá talan er um sjálvskuldaraábyrgd, hevur lángevarin rætt til beinanvegin at krevja veðhaldaran eftir falnum lánsgjøldum, um lánarin ikki rindar rættstundis og lángevarin hevur onga skyldu til at taka nøkur stig til fyrst at fáa peningin goldnan av lántakaranum.

Hevur landskassin t.d. sum veðhaldari lagt út fyri falna skuld, má tað almenna senda kravið til inkasso og um neyðugt sjálvt taka stig til at fáa veðsettu ognina selda á tvingsilssølu.

Er talan um einfalt veðhald, má lángevarin fyrst søkja sær fulnað fyri kravinum hjá skuldaranum, áðrenn hann kann krevja veðhaldaran eftir gjaldi.

Kann lángevarin prógva, at skuldarin ikki kann gjalda, t.d. tí hann er farin konkurs, í likvidatión, ella at nyttuleys úttøka er gjørd, kann hann krevja skuldaran eftir tí, sum ikki kann fáast úr búnum.

Trygdin hjá fíggjarstovnunum at veita lán móti sjálvskuldaraábyrgd ella móti einfaldum veðhaldi skuldi verið tann sama, men er munurin tann, at í seinna førinum má lángevarin sjálvur taka sær av innkrevjingini av láninum.

Í serligum førum gevur lógin tó heimild til at veita sjálvskuldaraábyrgd fyri útlendskari fígging til fiskiskip og farmaskip, tá hugsast kann, at útlendskir fíggjarstovnar, ið einki kenna til føroysk viðurskifti, annars ikki vilja veita nakra fígging.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

lögtingsmáli nr. 97/1989: Brotringar í ymsum lógum um landskassaveðhald.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 13. mars 1990 og eftir 1. viðgerð 13. mars beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir eina samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

FÍGGJARNEVNDIN, 20. apríl 1990.

Anfinn Kallsberg	Flemming Mikkelsen	Heine O. Heinesen
Eilif Samuelsen	Jørgen Thomsen	Jógvan Durhuus
	Tordur Niclasen	

Løgtingsgrannskoðararnir

Á l i t
í
Løgtingsmáli nr. 88-1/1989: Grannskoðan av almennum roknskapum.

U p p s k o t
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Sjónvarp Føroya fyri árini 1987 og 1988.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum.

Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað roknskapirnar hjá Sjónvarpi Føroya fyri omanfyrinevndu ár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskiftini og skjalatilfarið hjá sjónvarpinum eru kannað og í lagi.

Høvuðsinntøka sjónvarpsins var fyri omanfyrinevndu roknskaparár sjónvarpsgjaldið, um 10,3 mio. kr. í 1987 og um 11 mio. kr. í 1988. Gjaldið hækkaði úr 950 kr. í 1987 up í 1000 kr. í 1988. Hetta svarar til eini 10.800 sjónvarpstól í 1987 og 10.960 sjónvarpstól í 1988. Av tí at um 14.000 húsarhald vóru í landinum um hetta mundið, halda løgtingsgrannskoðararnir, at ikki allir hyggjarar eru skrásettir, og at Sjónvarp Føroya kundi fingið eitt sindur meir í inntøku frá hesi keldu.

Í 1987 fekk stovnurin 650 t.kr. í landskassastudningi, sum tó ikki vóru goldnar fyrr enn í 1988, tá Sjónvarp Føroya við eykajáttan fekk 4,8 mió. kr. í rakstrarstudningi, sum varð inntøkuført í rakstrarroknskapinum fyri hetta árið.

Útreiðslurnar til sendistøðir og studlið hækkaðu úr um 1,3 mió. kr. í 1987 upp í 2,4 mió. kr. í 1988.

Útreiðslurnar viðv. sendingum, lønum, upptøkum, ferða-útreiðslum, gjøldum fyri upphavsrætt o.a. hækkaðu úr um 7,85 mió. kr. í 1987 upp í um 8,0 mió. kr. í 1988.

Stjórnarútreiðslur, fyrisitingarlønir, skrivstovuhalds-útreiðslur, E.D.V. o.a. hækkaðu úr um 3 mió. kr. í 1987 upp í um 4,7 mió. kr. í 1988.

Úrslitið í 1987 var -1,762 mió. kr., og í 1988 +529 t.kr. Sjálvur raksturin í 1987 gav hall uppá um 2,1 mió. kr. Landskassastuðningurin var hetta árið 650 t.kr. Í 1988 gav raksturin um 4,1 mió. kr. í halli. Landskassastuðningurin í 1988 var 4,8 mió. kr.

Á fundi fýltist sjónvarpsstjórin á, at landsstýrið drálar við at góðkenna uppskot stovnsins til rakstrarætlan, ofta fleiri ársfjórðingar eftir, at uppskotið er sent landsstýrinum til góðkenningar. Hetta drál forðar haldgóðari fíggjarstýring. Eitt dømi var ætlan landsstýrisins í 1989 at geva Sjónvarpi Føroya eykainntøkur við "bingospæli" og lýsingum, men uppskotið fall í tinginum og tók sostatt hesa væntaðu inntøku frá stovninum.

Løgtingsgrannskoðararnir hava varnast stórar ferðaútreiðslur, í 1987 436 t.kr., sum tó eru minkaðar niður í 319 t.kr. í 1988.

Stjórnarútreiðslurnar hækkaðu úr um 3 mió. kr. í 1987 upp í 4,7 mió. kr. í 1988, mest tí 1 mió. kr. meir varð nýtt til nýggjar E.D.V.-skráir tað seinna árið enn árið fyrr.

Eftirstøðurnar av sjónvarpsgjaldi øktust úr um 3,1 mió. kr. í 1987 upp í um 3,3 mió. kr. í 1988. Sostatt sýnist tað hjá Sjónvarp Føroya eins og hjá Útvarp Føroya at gerast truplari at krevja inn.

Løgtingsgrannskoðararnir fegnast um, at átalan frá roknskapargrannskoðaranum stovnsins í 1987 um avrokning av ferðaútreiðslum er fingin í rætt lag í 1988.

Í 1987 lænti Sjónvarp Føroya 3 mió. kr. frá Føroya Landsstýri. Í grannskoðarafrágreiðingini fyri 1988 verður gjørt vart við, at eingin avtala er um tíð og máta at gjalda hesa skuld aftur, men sjónvarpsleiðslan vantar at kunna gjalda hetta lán aftur í 1990.

Løgtingsgrannskoðararnir ávara móti, at sjónvarpið í ov stóran mun samsýnir sínum starvsfólkum eyka veitingar. Í 1987 725 t.kr. og í 1988 787 t.kr. oman á føstu lønirnar. Hetta er serliga galdandi fyri deildarleiðararnar. Sjónvarpsstjórin hevur skrivliga greitt løgtingsgrannskoðarunum frá, at eykasamsýningar eru fyri eykaarbeiði í sambandi við upptøkur, og eru í hvørjum einstokum føri heimilaðar av landsstýrinum og sambært sáttmálaloyvdari yvirtíðarskipan. Her er dømi um, at landsstýrið hevur givið eftir fyri trysti um eykasamsýningar frá stovnsleiðslu, sum kann fáa avleiðingar fyri aðrar stovnar og kosta landskassanum dýrt. Frígonga er ein møguleg loysn í staðin fyri yvirtíð, og ivaleyst billigari.

Løgtingsgrannskoðararnir søknast eftir meiri fullfíggjaðari uppseting av fíggjarstøðu stovnsins í ársroknskapinum. Fíggjarstøðan javnvigar nevniliga bert við um 4,6 mió. kr. pr. 31/12 1987, og við um 4,3 mió. kr. í 1988. Tey stóru tølini, sum áttu at vist íløgu-, ognar- og skuldarviðurskiftini hjá so umfatandi hátøknifrøðisliga stovni, eru bókaðar burtur í landskassaroknskapinum, ella fyri seg í roknskapinum hjá grunnunum. Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at fíggjarstøðan hjá Sjónvarpi Føroya verður uppsett og bókað á sama hátt sum Útvarpið, har øll aktiv og passiv eru í sama roknskapi.

Løgtingsgrannskoðararnir hava fingið upplýst frá roknskaparleiðslu sjónvarpsins, at báðir sjónvarpsgrunnarnir eftir boðum úr landsstýrinum fíggjaðu innrætting av, og tekniska útgerð í Havnar Bio, sum í 1987 og 1988 kostaðu um 6,4 mió. kr.

tilsamans. Úr sjónvarpsgrunninum var eisini goldið Teleforverkinum fyri sendinerið um 1 mió. kr. í 1987, og um 2,8 mió. kr. í 1988. Íroknað tann pening, sum Sjónvarp Føroya nýtti úr sjónvarpsgrunnunum í 1987 og 1988, var samlaða peinganýtsla sjónvarpsins um 6,8 mió. kr. í 1987 og 3,5 mió. kr. í 1988 hægri enn sjálvir roknskapir stovnsins vísa.

Sjónvarpsgrunnarnir eru tveir:
Tollgrunnurin (løgtingslóg 26 frá 8/5 1969) fær pening frá tolli av innfluttum sjónvarpstólum. 1. apríl 1984 var hesin grunnur negativur við um 5,6 mió. kr., og yvirnýtslan vaks til um 8,6 mió. kr. við árslok 1987. Landsstýrið heimilaði 5. oktober 1988 at dekka hetta yvirtrekk við at flyta 14,5 mió. kr. frá hinum grunninum, sjónvarpsgrunninum, sum fær sítt fæ frá landskassanum játtað á løgtingsfíggjarlógini. Við árslok 1988 var tollgrunnurin sostatt positivur við um 4,4 mió. kr.

Við árslok 1988 var sjónvarpsgrunnurin, sum tá alt hevði fingið játtað 18,9 mió. kr. á løgtingsfíggjarlógunum, m.a. til nýtt sjónvarpshús, brúktur til alskyns rakstrarútreiðslur og tekniskar íløgur, keyp og leigu av fyribilshølum, at bert 1,155 mió. kr. var eftir í honum.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrið loyvir almennum stovni at hava so kostnaðarmiklan rakstur, uttan at stovnurin í rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu síni gevur tingmonnum og almenningini minsta varhuga av veruliga kostnaðinum av virksemi stovnsins.

Sjónvarpsstjórin upplýsti á fundi, at stovnurin í 1985 og 1986 heitti á Føroya Landsstýri um frameftir at fáa greiðu á umsiting sjónvarpsgrunnunna. Føroya Gjaldstova umsitir eftir galdandi reglum hesar grunnar saman við landsstýrinum, sum ávísur úr teimum. Sundurbýting av ábyrgd av grunnunum hevur víst seg at verið tvørlig.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at Sjónvarpi Føroya verður álagt at brúka ein roknskaparhátt, sum gevur meiri fullfíggjaða mynd av stovnsins raksturi og fíggjarstøðu, og ikki sum nú bert ein brotpart av kostnaði stovnsins.

Løgtingsgrannskoðararnir seta tí fylgjandi uppskot til samtyktar:

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið heitur á landsstýrið um at áleggja Sjónvarp Føroya nýggjan roknskaparhátt, sum vísir veruliga fíggjarvirksemi stovnsins, og at syrgja fyri, at reglurnar fyri peningagávuni úr grunnunum verða greiðar.

Løgtingsgrannskoðararnir, 10. apríl 1990

Óli Breckmann

Jákup Lindenskov

Karin Kjølbro

Flemming Mikkelsen

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 88-2/1989: Grannskoðan av almennum roknskapum

Uppskot

til

Samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Útvarp Føroya fyri árini 1987 og 1988.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Løgtingsgrannskoðararnir hava grannskoðað roknskapirnar hjá Útvarp Føroya fyri omanfyri nevndu ár og fingið vissu fyri, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Í 1987 gav samalaða útvarpsgjaldið um 14,2 mió. kr. við 20.325 lurtarum á 700 kr. móti 14,8 mió. kr. árið fyri. Orsøkin til afturgongdina er at ein "lurtarakanning" í 1986 gav eitt serliga stórt tal av ársgjoldum. Næststørsta inntøkan í 1987 var kungerðir, kvøðuljómar og sektarpeningur, ialt um 4,4 mió. kr. V4 spælið gav í netto Ú. F. um 3,2 mió. kr. Sostatt jevnvigar roknskapur stovnsins við 21,5 mió. kr.

Útreiðslurnar vóru til útvarpsstøðir og studi ið um 746 t. kr. til útvarping. Lønir, ferðing og samsýningar um 10,7 mió. kr. Til stjórnarútreiðslur, skrivstovuhald og E. D. V. um 3,7 mió. kr., ialt um 15 mió. kr.

Rentuútreiðslurnar lógu um 2 mió. kr. avskrivingar um 4,3 mió. kr. ialt um 21,6 mió. kr.

Rakstraravlopið knappaðist um 200 t. kr.

Eftirstøður av útvarpsgjaldi øktist frá 1986 til 1987 við um 1,8 mió. kr. upp í 5,6 mió. kr. Sostatt gerst tuplari ár undan ári at fáa Útvarpsgjaldið inn til ásettu tíð.

Útvarpshúsið er í 1986 roknskapinum avskrivað við um 2,9 mió. kr., sum bæði fevnir um goldnar avdráttir um 1,9 mió. kr. og 1. mió. kr. til afturgjaldingar av tí, ið Føroya Landsstýri hevur lagt út.

Til tess at greiða allar avskrivingar fekk Ú. F. í 1986 2,5 mió kr. játtaðar á løgtingsfíggjarlógini.

Í 1988 lækkaði inntøkan av útvarpsgjaldi niður í um 12,85 mió. kr.

Kunngerðir, kvøðuljómar o. a. góðu um 3,2 mió. kr. V4 spælið gav um 3 mió. kr. fyri árið.

Samlaða inntøka stovnsins og rakstrarroknskapur javnvigaðu við um 21,o mió. kr. Hetta er ein afturgongd í inntøkunum tilsamans við 750 t. kr. frá árinum fyri.

Á útreiðslusíðuni rindaði Ú.F. til Útvarpstøðir og studioið um 700 t. kr. Til útvarping, lønir, samsýningar, ferðir o.a. um 10,7 mió. kr. Til stjórnarútreiðslur, E. D. V. o.a. um 3.9 mió. kr. Í rentuútreiðslum bar stovnurin um 1,7 mió. kr. og í avskrivingum um 3,8 mió. kr.

Rakstraravlopið var um 142 t. kr.

Til tess at røkka hesum avskrivingum fekk Ú. F. játtað 4. mió. kr. í landskassastuðningi.

Eftirstøðan fyri útvarpsgjald vaks aftur fyri 1988, so hon tá varð um 7,2 mió. kr. falt, hækkað við 647 t. kr. ella um 10% frá árinum fyri.

Ásannast má at rakstrarroknskapur útvarpsins hevur javnvigað á leið somu hædd, 20 til 22 mió. kr. farnu trý roknskaparárini. Tíðast inntøkurnar frá útvarpgjaldinum eru lækkaðar úr 14,8 mió. kr. niður í 12,8 frá 1986 til 1988, hevur eydnast stovninum at vinna henda miss aftur við inntøkum frá kunngerðum og V4 spæli. Henda seinasta inntøkukelda hevur ligið støðugt um 15% av samlaðu inntøkunum hjá útvarpinum.

Fíggjarstøða útvarpsins javnvigaði við um 39 mió. kr. í 1987 og 40 mió. kr. 1988.

Útvarpshúsið, sum kostaði um 31,5 mió. kr. at útvega, er ult. 1988 avskrivað niður í um 17,6 mió. kr.

FM og Millumbylgjusendarin verða avskrivaðir um roknskap landskassans.

Løgtingsgrannskoðararnir, 10. apríl 1990

Óli Breckmann

Jákup Lindenskov

Karin Kjølbro

Flemming Mikkelsen

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 98-3/1989: Grannskoðan av almennum roknskapum

Uppskot

til

Samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Postverki Føroya fyri árini 1987 og 1988.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Postverki Føroya fyri omanfyri nevndu ár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar eru kannaði, og at roknskapur og fíggjarliga stoða postverksins eru í lagi.

Rakstrarúrslit Postverksins vísir uml. 3,25 mió. kr. í halli fyri 1987 og 8,55 mió. kr. í halli fyri 1988. Eginogn fyrra árið var uml. 30,5 mió. kr. og seinna árið uml. 25 mió. kr. eða eitt afturgongd uppá 5 mió. kr.

Rakstrarinntøkurnar vóru uml. 48,9 mió. kr. í 1987 (móti 44,8 mió. kr. 1986), og uml. 55,9 mió. kr. í 1988.

Vanliga postvirksemið gav í 1987 um 18,2 mió. kr. í halli, og 1988 20,7 mió. kr.

Frímerkjadeildin og aðrar inntøkur bøttu tó um endaliga úrslitið.

Frímerkjasølan sum fólk settu so stórar vónir til sum inntøkukeldu, tá postverkið varð yvirtikið, hevur víst seg at verið fallandi niður í um 9,4 mió. kr. í 1987 og um 7 mió. kr. til avlops í 1988.

Aðrar inntøkur hjá Postverkinum, renta av m.a. innistandandi peningi, vísti um 5,6 mió. kr. í 1987 og um 5,1, mió. í 1988.

Hetta seinra árið er hitt lakasta síðan 1982/83 hjá frímerkjadeildini.

Besta árið var 1979/80, tá deildin nevði 23,3 mió. kr. til avlops.

Afturgongdin í føroyskari frímerkjasølu hevur gjørt grundarlagið undir ynski og ætlan løgtingsins og landsstýrisins at miðspjaða frímerkjaarbeiði veikari. Postverkstjórin upplýsti á fundi við løgtingsgrannskoðararnar, at frímerkjadeildin gevur fitt av arbeiði, 37 fólkum við fastari løn og 40 fólkum við tímaløn, harav tvey í Hvalba og eitt í Sumba, og restin á Argjum.

Postverkstjórin helt ikki tað bera til at siga fólk úr starvi fyri at flyta tey út á bygd, uttan so at náttúrlig frágongd er frá verandi frímerkjadeild. Afturvendandi kravið um miðspjaðing er tí enn ikki gingið á móti av Postverkinum.

Gomlu postmeistarahúsini í Vági ynskir Postverkið at selja landsstýrinum, tí tey forfalla og verða ikki brúkt.

Í seinasta áliti løgtingsgrannskoðarana fyri 1986 varð borið uppá mál ætlaðar byggingar av nýggjum posthúsum t.d. á Tvøroyri, í Sørvági, við Gøtugjógv og Runavík. Síðan tá sýnist ikki meir at verða hent á hesum øki. Postverkstjórin upplýsir nú at á Tvøroyri er arbeiði farið í gongd í 1989.

Løgtingsgrannskoðararnir, 10. apríl 1990

Óli Breckmann, form.

Flemming Mikkelsen

Karin Kjølbro

Jákup Lindenskov

Løgtingsgrannskoðararnir

Á l i t
í
Løgtingsmáli nr. 88-4/1989 : Grannskoðan av almennum roknskapum.

U p p s k o t
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Menningarstovuni fyri árini 1986, 1987 og 1988.

Frágreiðing frá Løgtingsgrannskoðarunum.

Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað roknskapir og frágreiðingar fyri árini 1986, 1987 og 1988 og fingið vissu fyri, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Menningarstovan er nýggjur stovnur sambært løgtingslóg nr. 46 frá 5. mai 1987. Menningarstovan hevur, umframt aðrar uppgávur, tikið partar av virkseminum hjá Ídnaðarstovuni, ið varð formliga niðurlagd 31.12.1985, og hýsir eins og henda Vestnordensamstarvinum. Roknskapirnir fyri 1986 og 1987 lýsa sostatt ikki væl virksemið hjá Menningarstovuni.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, nú reglugerð fyri Menningarstovuna er samtykt á landsstýrisfundi tann 20. februar 1990, at menningarráðið, samtykt av landsstýrinum á fundi 18. apríl 1987 sb. grein 4 í løgtingslóg frá 4. mai 1987, við 15 limum verður skipað og fært at virka, um hesin almenni stovnur skal hava nakað endamál.

Rakstrarroknskapur Menningarstovunar vísir eitt úrslit uppá uml. 161.500 kr. fyri 1986, uml. 800.000 kr. fyri 1987 og umleið -304.000 kr. fyri 1988.

Roknskapargrannskoðarin fýlist á, at ofta gongur ov long tíð, áðrenn ferðapeningur, sum útgoldin verður á conto, verður avroknaður. Menningarstjórin greiðir frá, at útreiðslur til ferðir og umboðan eru rættuliga nógv vaksnir, kr. 120.000 í 1988, og at frágreiðingar nú verða gjørdar fyri hvørja ferð sær.

Roknskapargrannskoðarin vísir á, at Menningarstovan flytir játtanir sínar á fíggjarlógini á sjálvstøðugar konti.

Løgtingsgrannskoðararnir fýlast á hesa mannagongd, tí hon kann verða fordømi fyri aðrar stovnar, ið náttúrliga bóka sínar inntøkur og útreiðslur í landskassarokningini.

Til hesa viðmerking svarar Menningarstovan, at ráðið á fundi 28. oktober 1988 samtykti um at halda fast við, at stovan ikki er ov nær knýtt at gjaldstovunar dagliga rakstri. Hetta er í tráð við mannagongdina hjá Íðnaðarstovuni.

Menningarstovan bókar sínar játtanir til ávís projekt uttan fyri roknskapin, men tap av projektinum yvir raksturin á stovninum.

Roknskapargrannskoðarin mælir til, at landsstýrið avger, hvussu rentuinntøkan av innistandandi peningi viðv. projektum skal viðgerast.

Tey projekt, talan hevur verið um fram til árslok 1988 eru:

Matvøruvirkið		0,2 mio. kr.
Surimi		1,0 mió. kr.
Klipslina		0,5 mio. kr.
Scandinavian Consult Aps.	um	1,5 mio. kr.
Framsýning 1, Pol Fisch El	um	1,0 mio. kr.
P/F Rógv		0,2 mio. kr.

Surimi og Scandinavian Consult Aps. projektini miðjaðu ímóti at framleiða svartkjaftaúrdráttir og fremja sølu av teimum uttanlands.

Annars fýlist menningarstjórin á, at tilráðingar frá Menningarstovuni ikki verða fylgdar upp av landsmyndugleikunum, eftir at tær eru viðgjørdar av Menningarstovuni.

Løgtingsgrannskoðararnir, 10. apríl 1990

Óli Breckmann, form. — Flemming Mikkelsen

Karin Kjølbro — Jákup Lindenskov

Løgtingsgrannskoðararnir

Álit

frá

Løgtingsmáli nr. 88-5 /1989: Grannskoðan av almennum roknskapum.

Uppskot

til

Samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Strandferaskipum Landsins fyri fíggjarárini 1983/84, 1984/85, 1-4 til 31-12-1985 og roknskaparárini 1986, 1987 og 1988.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað roknskapirnar hjá Strandferaskipum Landsins fyri ovanfyri nevndu ár og fingið vissu fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá stovnunum eru kannað og í lagi.

Løgtingsgrannskoðararnir biðja umbera, at so nógvir roknskapir hjá stovnunum eru komnir upp í røkur. Orsøkin er, at tað bar ikki til hjá undantøkum nevnd at greiða roknskapirnar frá fyrra valskeiði til tingsins viðgerð.

Inntøkur og útreiðslur hjá stovnunum vóru nevndu ár:

Ár	Inntøkur Mill.kr.	Útreiðslur Mill.kr.
1983/84	49,5	71,5
1984/85	41,5	86,0
1-4 - 31-12-1985	36,6	76,0
1986	46,7	81,4
1987	55,7	86,4
1988	62,8	116,8

Samlaða rakstrarhallið hjá stovnunum nevndu ár var:

Ár	Mill.kr	Játtað	Meirútgjald
1983/84	21,1	31,5	-10,4
1984/85	41,7	36,0	8,7
1/4 - 31/12-1985	39,3	30,5	9,0
1986	49,3	52,0	-2,7
1987	47,8	49,5	-1,7
1988	73,5	55,3	18,2

Høvuðsorsøkin til inntøkumarkingina rokningsárið 1983/84 til 1984/85 var lækking í Leiguinntøkuni hjá Smyril og serliga Teistanum, sum tað fyrra árið var í uttanlandssigling í Karibiska Havinum.

Í fíggjarárinum 1984/85 fekk stovnurin av álvara mýsingin og stóra útreiðslu í "Smíðum" um 6-7 mió. kr. árliga.

Rakstrarhallið tíðina eftir 1985 vaks av tí nógv ørkuu siglingini út á kvøldið, so fleiri manningar og meir enn eitt skip kravdust til at røkja somu farleið í fleiri førum.

Løgtingsgranskoðararnir gera vart við tað neyðuga í eini búskaparliga tryggari fíggjarstýring ístaðin fyri politiska stýring av so umfatandi tænastustovni.

Løgtingsgranskoðararnir gera eisini vart við, at politisku krøvini um sigling í ørtíð førdu til øka manningar, fleiri skip á sumum rutum, og forðar stovninum í tryggari fíggjarstýring.

Frá 1985 ger rokningsgranskoðari Strandferðslunnar í frágreiðing síni vart við, at stovnurin hevur ov stóra útlatøðu uttan at rokna sær rentur, bóast góð teldutkipan er, og er ikki nóg virkin í at krevja útistøður inn.

Fyri rokningsárini 1986, 1987 og 1988 vísir rokningsgranskoðarin á, at ongar greiðar reglur eru á stovninum fyri t.d. ferðaútreiðslur og rýtslu av bilum. Avrokna verður fyri ov nógvar ferðadagar, skjølini verða bókað uttan eftirrokning og

váttar. Hesum átalum tóku løgtingsgrannskoðararnir undir við og heita á landsstýrið í sturdini at steðga hesum óskili, um tað ikki er steðgað nú.

Fyri 1986 finnist roknskapargrannskoðarin at, at samlaða uppheddin av skuldarum til Strandferðsluna er sett til 11,5 mió. kr., ið má metast av hogt og verulsikafjart.

Seint gongur við innkrevjing og avgreiðslu, tá steðgur kemur í inngjalding. Hetta roknskaparár mælir roknskapargrannskoðarin stovninum til at krevja úr landskassanum milliónir uppheddir, ið stovnurin hevur lagt út vegna landsstýrið.

Sama roknskaparár fillist roknskapargrannskoðarin á, at SL-avgreiðslurnar kring landið skylda Strandferðsluni stórar uppheddir fyri lønir til starvsfólk, ið eru sett í starv eftir munnligari avtalu, og mælir til at fáa hesi viðurskifti í rættlag við reglugerð

I 1986 stemmar millumrokningin hjá Strandferðsluni ikki við bókføringina hjá Foroya Gjaldstovu. Munurin er um 5,6 mió. kr. og stavar frá t.d. projekterings, umvælingararbeiði og keypi av tekniskari útgerð, ið ertir galdandi skikki hjá hesum stovni verða goldin av landskassanum.

Átalar hevur munað, at 31. desember 1987 hevur Strandferðslan gingið áheitanini frá roknskapargrannskoðaranum á moti og bókað millumrokningina.

Fyri roknskaparárið 1987 átalar roknskapargrannskoðarin, at Strandferðslan við táverandi skipan ikki megnaði at útvega upplýsingar til uppsetan av fíggjarstøðu o.ø., hvørki inntøkur ella útreiðslur. T.d. bar ikki til at kanna talið á ferðafólki fyri hvønn túr og hvørja rutu sær, talið á børnum og vaksnum, og hvør rindar fult gjald, hvørjar avsláttarskipanir eru, ella hvussu stórur bilflutningurin er. Heldur ikki megnaði stovnurin tá at have skil á útreiðslum og farmaðrovum, lagtalum fyri nøgd, inntøkur ella útreiðslur á hvørjum bili, ella hvørjari rutu sær.

Um bilparkina hjá Strandferðsluni er at siga, at flutningsgjaldirnar verða keyptar yvir raksturin. Men av ófullfíggjaðari inntøku

og útreiðsluskipan fyri hesa part av stovninum ber ikki til at siga við vissu, í hvønn mun hesin lastbilafloti kiárar sínar útreiðsluskyldur, forrentaring og umvæling. Slíkar upplýsingar meinar roknskapargrannskoðarin verða minstamark fyri fíggjarligari stýring.

Nú er serlig skipan fingin við nýggjum billettmaskinum til nevndu endamál. Men løgtingsgrannskoðararnir viðmerkja í hesum viðfangi, at keypið av hesum maskinum av táverandi landsstýrismanni var óheimilað, og at slíkur keypsháttur kann ikki góðtakast.

Í roknskaparárinum 1987 eyðkendi óskikkurin við ferðaútreiðslum at vera komin í hæddina.

Debitorarnir eru í 1987 komnir upp í 11,6 mió. kr. tilsamans. Flestu eru virki í gjaldstrupulleikum, óavgreiddar tryggingarsakir og ágóði frá uttanlandssigling. Roknskapargrannskoðarin átalar, at Strandferðslan og ikki landskassin rindar leasing-gjald fyri Vípuna.

Løgtingsgrannskoðararnir vísa á tað tyngjandi rentubyrði, ið Strandferðslan hevði at dragast við roknskaparárini 1987 og 1988, tá kassakreditturi stovnsins hjá peningastovnunum falt lá millum 9 og 10 mió. kr. við árslok bæði árini. Hægst loyvda mark var 1 mió. kr. hjá hvørjum peningastovni. Eisini skyldaði Strandferðslan tørum kreditorum í Føroyum, serliga oljufelagum og skipasmiðjum, stórar upphæddir, við árslok fyrra árið 9,9 og við árslok seinna árið 13,5 mió. kr.

Í roknskaparárinum 1988 eyðkist raksturin av Strandferðslunni at hava verið sum fram eftir fullum avlagaður undir ótolandi politiskum trýsti. Rakstrarhallið varð yvir 72 mió. kr. Alla 18 mió. kr. meir enn avsett á fíggjarlogtingslógini. Útreiðslurnar hetta árið vóru 28,4 mió. kr. hægri enn árið fyri, meðan inntøkurnar vuksu bert 7,1 mió. kr.

Klassing av tveimum skipunum og nýggi motorurin til Smípuna kostaði 15 mió. kr. Í fíggjarætlanini metti Strandferðslan sjálvt útreiðslurnar til 19 mió. kr., men tær bilvu 31,9 mió. kr. Av vánaligt samstarvi hevur fleiri ár verið millum ta umsitingarligu og teknisku leiðslurna á stovninum. Úrslitið hevur verið stórur kapitaltorvur, tá óvæntað teknisk krøv hava tyngt raksturin,

eftir at fíggjarætlan er gjørd.

Við ársslok 1988 var samlaða útistoðan hjá Strandferðslunni um 15 mió. kr. Størsti einstaki skuldarin hjá stovninum var Bygdaleiðir, sum tá skyldaði 3,3 mió. kr., tí engin sáttmáli var millum hesar báðar almennu flutningsstovnar. (Hetta rokn skaparár var hallið hjá Bygdaleiðum um 28 mió. kr. ella dupult so stórt sum samlaða játtanin til Bygdaleiðir var.)

Løgtingsgrannskoðararnir hýta merki í, at óskilið við ferðaútreiðslum hjá stovninum aftur í 1988 verður innført í frágreiðingina hjá rokn skapargrannskoðaranum og átala hetta ólag.

Endaliga vísa løgtingsgrannskoðararnir á, at hetta áliti ikki umfatar rokn skap strandferðslunar fyri rokn skaparárið 1989. Hesin verður væntandi liðugur um hálvan apríl h. á., og vóna løgtingsgrannskoðararnir at vend er komin í ólagið. 1989 rokn skapurin verður lagdur fyri tingið so skjótt sum løgtingsgrannskoðararnir hava fingið hendur á honum.

Løgtingsgrannskoðararnir 8. mai 1990

Óli Breckmann, form.

Jákup Lindenskov

Karin Kjølbro

Flemming Mikkelsen

Kristiligi Fólkaflokkurin
Føroya Framburðs- og fiskivinnuflokkur

Løgtingsmál nr. 89/1989: Lógvi til at veiða skarv somu tíð sum lunda, lomvigu og álku.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum verður § 17, 2. stk. broytt soleiðis, at punkt c) verður strikað, og í punkt b) verður sett aftan á "lomviga": ", skarv".

§ 2

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.m.

§ 1.

I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst med senere ændringer m.v. ændres § 17, stk. 2 således, at punkt c) udgår, og i punkt b) indsættes efter "lomvie": ", skarv".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Sambært galdandi lóg er loyvt at veiða skarv frá 1. september til 31. oktober, t.e. 2 mánaðir, og lunda, lomvigu og álku frá 1. oktober til 20. januar.

Tað tykist mongum løgið, at skarvur skal verða ein hin mest friðaði fuglur á okkara leiðum, serliga tá ið havt verður í huga, at skarvur etur nógvan seið og murt og ger seg inn á alibrúkini. Alarar hava fingið loyvi til at verja seg í móti kópi, men lógin heimilar teimum ikki at verja seg í móti skarvi.

Tað er mest vetrarmánaðirnar, skarvurin er at siggja í stórum tali á okkara leiðum, og kenir fuglamenn sum Niels á Botni í Nólsoy søgdu, tað verða Hetlandsskarv, sum kom herda veg. Serliga ringt er tað lágættarvetrarnar.

Tí verður hetta uppskot sett fram.

Á FØROYA LØGTINGI, 16. mars 1990.

Juul Jacobsen, løgtingsmaður

Løgtingsmáli nr. 89/1989: Lovvi til av veiða skarv somu tíð sum lunda, lomvigu og álku.

Málið er framlagt av Kristiliga Fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og fiskivinnuflokki tann 16. mars 1990 og eftir 1. viðgerð 22. mars 1990 bainst í umhvørvisnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Berg Olsen, fuglafrøðing, ið upplýsti seinastu metingarnar um fuglastovnarnar á okkara leiðum.

Staðfest er, at fuglastovnarnir her og í londunum í Norðuratlantshavi eru í støðugari minking.

Skarvastovnurin í Norðuratlantshavi er mettur nú at vera umleið 60.000 pør, harav 70% í Stóra Bretlandi. Talið í Føroyum verður mett at vera umleið 1.500 pør, men verður lítið veitt.

Undir viðgerðini í nevndini varð víst á tað óhepna í, at speed-bátar og pumpguns verða nýtt í fuglaveiðu.

Víst varð á, at avmarkanir kunnu føra at verða torførar at umsita.

Umhvørvisnevndin er av teirri áskoðan, at galdandi lóg ikki skal broytast og mælir sostatt tinginum frá at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

UMHVØRVISNEVNDIN, 27. apríl 1990

Eliesar Arge Finnbogi Ísakson Edmund Joensen

Marita Petersen Lasse Klein

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURÐS- OG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 90/1989: Skatting av egning á landi fyri seg.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um at skatta egning á landi fyri seg.

§ 1. Inntøka, sum stavar frá egning á landi, skal ikki gevast upp í uppgerð fyri skattskyldugu inntøku í skattaárinum 1990 og fylgjandi ár eftir løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt nr. 86 frá 1. september 1983.

2. stk. Tann í 1. stk. nevnda inntøka verður harafturímóti skatta eftir reglunum í hesi lóg.

3. stk. Skatturin fer í landskassan, sum veitir endurgjald til kommunurnar gjøgnum eina heildarveitingarskipan.

lagtingslov om at skatte agnpåsætning på land særskilt.

§ 1. Indtægt, som stammer fra agnpåsætning på land, skal ikke angives i opgørelse for skattepligtig indtægt i skatteåret 1990 og følgende år efter lagtingslov om landsskat og kommuneskat nr. 86 af 1. september 1983.

Stk. 2. Derimod skal den i stk. 1 nævnte indtægt skattes efter reglerne i denne lov.

Stk. 3. Skatten indbetales i landskassen, som yder kommunerne refusion gennem en bloktilskudsordning.

§ 2. Inntøka, sum stavar frá egning á landi, verður skatta fyri seg á tann hátt, at 10% verða at draga frá lønini, tá ið hon verður útgoldin, og flutt landskassanum yvir afturhaldsskipanina.

§ 3. Landsstýrinum er heimilað at fyriseta gjølligari reglur um skattarindingina og heildarveitingarskipanina.

§ 4. Brot móti reglunum í hesi lóg og reglugerðum, sum fyrisetter verða eftir henni, koma undir sekt, sum fer í landskassan, um so er, at meinari revsing er ikki uppiborin eftir almennu revsingarlógini.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

§ 2. Indtægt, som stammer fra agnpåsætning på land, skal skattes særskilt på den måde, at 10% fradrages lønnen under udbetaling og overføres landskassen over refusionsordningen.

§ 3. Landsstyret er bemyndiget at forestå nøjagtige regler om skattebetalingen og bloktilskudsordning.

§ 4. Overtrædelser af reglerne i denne lov og regulativer, som administreres efter denne, straffes med bøde, hvis ikke hårdere straf er forskyldt efter straffeloven.

§ 5. Denne lov træder i kraft dagen efter den bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Tað er eitt gamalt ynski hjá útróðrarfeløgunum, at egning á landi verður skattað fyri seg á sama hátt, sum eitt nú rentuinntøka av innistandandi peningi í føroyskum peningastovni verður tað, smb. lóg nr. 4 frá 26. mars 1953.

Tað er øllum kunnugt, at trupulleikarnir í høvuðsvinnu okkara í dag gera tað neyðugt við tiltøkum, ið lætta um. Tað hevur landsstýrið eisini ásannað og tí lagt uppskot fyri løgtingið um at sleppa ymiskari útgerð og tilfari undan eykainn-

flutningsgjaldinum upp á 6%, sí tingmál nr. 41. Millum hesa útgerð er nevnt togverk, wirur, trol og brennioljа. Tað er greitt, at talan er um stóran lætta í krónum og oyrum, serliga til hin eina veiðiháttin. Teimum, sum veiða fisk við háki, eigur eisini at verða lurtað eftir. At skatta egning á landi fyri seg loysir nógvar trupulleikar á útróðrarplássum og ger tað lættari at fáa línuna egnda. Samstundis verður umsitingin hjá líkningarvaldinum minni, tí skiparin er einføld.

Ein onnur grundgeving fyri hesum lógaruppskoti er, at landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot um avtøku av lógini um serviðbót til pensjónistar. Henda lóg gjørdi tað, at pensjónistar kundu arbeiða fyri 30.000 kr., áðrenn teir mistu nakra viðbót. Almannastovan hevur upplýst, at heili 1600 fólk í 1989 hava fingið útgoldið 11,5 mió. kr. eftir lógini um serviðbót, sum landsstýrið nú vil avtaka. Nógvir pensjónistar hava egning sum íkomuka aftrat pensjónini og koma tí at missa pening við avtøku av lógini um serviðbót.

Tað má altíð loysa seg at arbeiða hjá tí, sum er vorðin eldri og brekaður.

Uppskotið um at skatta egning á landi fyri seg hjálpir heimaútróðrinum og ger tað hugaligari hjá tí einstaka, tá vil taka eina hond í og vera virksamur, og so kostar skipanin landskassanum einki.

Á FØROYA LØGTINGI, 22. mars 1990.

Níels Pauli Danielsen

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 90/1989: Løgtingslóg um at skatta egning á landi fyri seg.

Málið er framlagt av Kristiliga fólkaflokkinum Fjroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 22. mars 1990 og eftir 1. viðgerð 28. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen og Jákup Lamhauge) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Tórbjørn Poulsen og Atli P. Dam) er ikki samdur við uppskotsstillararnum um, at trupulleikarnir í høvuðsvinnu okkara verða loystir við, at skatta egning á landi fyri seg. Trupulleikarnir í fiskivinnuni skulu loysast á heilt annan hátt.

Tá tað í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður sagt, at serskatting av egning á landi við ávísum prosenti er ein einfald skipan, sum verður løtt at umsita, so er hetta ikki beint. Undir viðgerðini í skattanevndini hevur líkningarráðið sagt, at ein skipan sum tann av uppskotsstillararnum tilmælta als ikki kann brúkast saman við okkara kumulativu samtíðarskattaskipan.

Annars er minnilutin ímóti at gera skattligan mun á ymiskum arbeiði, og setir einki uppskot fram.

SKATTANEVNDIN, 20. apríl 1990.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heine O. Heinesen

Tórbjørn Poulsen Atli P. Dam

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURDS- OG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 91/1989: Broyting í skattalógini.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd hesa broyting:

Undir § 25, pkt. 3 aftan á orðini: "tó ikki renta av peningi innistandandi í føroyskum peningastovni, sambært løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953, og vinningsbýti frá partafeløgum v.m. skrásettum í Føroyum sambært 1.§, nr. 8" verður sett: "og inntøka frá egning á landi, sambært løgtingslóg nr. .. frá .....

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

Under § 25, pkt. 3 efter ordene: "dog ikke rente af indestående i færøsk pengeinstitut, jfr. lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953, samt udbytte fra på Færøerne indregistrerede aktieselskaber m.v. jfr. § 1, nr. 8" indsættes: "og indtægt fra agnpåsætning på land, i henhold til lagtingslov nr. .. af .....

§ 2.

Lógarbroytingin verður at galda fyri skattaárið 1989 og fylgjandi ár.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

§ 2.

Lovændringen træder i kraft for skatteåret 1989 og de følgende år.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Vist verður til viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 90 um skatt av egning á landi fyri seg.

Á FØROYA LØGTINGI, 21. mars 1990.

Niels Pauli Danielsen

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 91/1989: Broyting í skattalógini.

Málið er framlagt av Kristiligu fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 22. mars 1990 og eftir 1. viðgerð 28. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Heini C. Heinesen og Jákup Lamhauge) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Tórbjørn Poulsen og Atli P. Dam) vísir til álitið í løgtingsmáli nr. 90/1989: Løgtingslóg um at skatta egning á landi fyri seg - og setir einki uppskot fram.

SKATTANEVNDIN, 20. apríl 1990.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heine C. Heinesen

Tórbjørn Poulsen Atli P. Dam

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURDS-OG FJEKIVINNIFLOKKUR

Føroya Logting

Løgtingsmál nr. 92 /1989: Viðvíkjandi brøytingum í P-tals skipanini

U P P S K O T

til

samtyktar

"Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at taka neyðug stig til, at borgarar landsins sleppa undan at lata peningastovnum v.m. P-talið"

Viðmerkingar:

Fyri ikki so mongum árum síðan fekk hvør borgari her á landi eitt skrásetingarnummar - tað sokallaða P-talið, sum samansett er av føðidato og einum kontroll nummari.

Upplýst var, at hetta P-tal einans skuldi nýtast beinleiðis í samband við skattauppgerðina hjá tí einstaka.

Seinri er honda ramma viðkomið til eisini at umrøða, at hvør banka-konti skal bera P-tal lontakarans, soleiðis at peningastovnarnir uttan áheitan skuli lata skattavaldinum allar upplýsingar um kontohavaran í samband við árligu álíkningina.

Hetta gevur skattavaldinum møguleika fyri , gjøgnum telduskipan, at "eygleiða" hvønn einasta borgara í samskifti hansara við peningastovnarnar.

Í samband við skriv dagf. 22.11.1989 boðar landsstýrið og líkningarráðið øllum skattgjaldarum frá, at skipanin við P-talinum bert ber við sær "lagaligari loysnir fyri vanligum líkningararbeiði", og at mynduleikarnir haav skyldu til at tryggja borgarum, at uppl. um viðurskifti teirra ikki verða misbrúktir ella latnir óviðkomandi.

Hóast hesa regil so er ató vælskiljandi at borgarin kennir seg óttryggan og stúrnan fyri, at hetta er eitt fot nærri eini fulkomnari P-talsskipan, har øll viðurskifti borgarans eru skrásett, og har ein samankobling av "data-casum" skapa fortreytir fyri, at allir upplýsningar um einstaklingin(t.d. familjuviðurskifti, skúla-arb.-og sjúkuuppl.

kunnu heintast fram á skermin oðrum til kunningar.

Hetta kennist av góðum grundum óttygt fyri borgaran og má av sonnum sigast at vera ein munandi skerjing av persónliga frælsi hins einstaka.

Enn hevur hosin dagur her á landi ikki sæð dagsins ljós, men fær "kontrol-og skrásetingarráðið" loyvi at breiða seg, tá, so er dagurin tíanverri ikki langt burtur, har samfelagið er orðið eitt fullkomið kontrol-og skrásetingarsamfelag.

Tað byrjaði við, at P-talið hvørt skuldi nýtast í skattauppgerðini, men nú skulu bankarnir eisini hava P-talið um ehndi, og samtýtt skriv frá landsstýrinum, skulu allir borgarar óðrenn 1. juni 1990, hava handað peningastovnunum sítt P-tal.

Verður hetta ikki gjørt, kemur borgarin at kenna ravsingina soleiðis, at bankakonti hansara verða stongdar og hevur hann tá ikki longur moguleika fyri at liva eina nátúrliga tilveru her á landi.

Tí hvussu skal hann kunna breyðfeða seg og síni urtan pening????

Tá hugsað verður um hann ótryggleika borgarin kennir við hesa broyting, ið stendur fyri framman, átti landsstýrið alt fyri sitt at tikið neyðug stig til, at skipanin ikki verður sett í verk, serliga tá grundgevingin(samb. skriv frá 22.11.1989) hvørt er at gera lagaligari loysnir fyri vanliga líkningararbeiðnum.

Her átti umhugsanin fyri trívsli borgarans í einum frælsum samfelag at vigað tyngri!

Á FØROYA LØGTINGI 22.01.1990

Tórður J. Niclasen
løgtingsmaður.

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 92/1989: Viðvíkjandi broyting í P-talsskipanini.

Málið er framlagt av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Frambúðs- og Fiskivinnuflokki tann 22. mars 1990 og eftir 1. viðgerð 19. apríl beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur fundur verið við umboð fyri Líkningarráð Føroya og Skrásetingareftirlitið.

Meirilutin (Jógvan Durhuus, Eilif Samuelsen og John Petersen) vísir til, at landsstýrið arbeiðir við at endurskoða reglurnar um nýtslu av P-talinum, og verður tí ikki tikið undir við málinum og einki uppskot sett fram.

Ein minniluti (Marita Petersen og Tordur Niclasen) førir fram:

Tá vit í 1984 fingu samtíðarskattaskipanina, var mett neyðugt at fáa eina skrásetingarskipan, sum skuldi tryggja, at mistøk ikki komu í skattaskipanina millum borgarar við somu nøvnum. Eftir langa viðgerð og nógv tjak varð samtykt, at ein P-talsskipan skuldi setast í verk.

Samstundis varð gjørd løggáva um nýtslu av evnisskráum, sum skuldi tryggja tann einstaka soleiðis, at tað bert vóru viðurskifti hins einstaka mótvegis skattavaldinum, sum kundu skrásetast undir P-talinum.

Tá henda lógin kom, varð víst á, at føroyska skrásetingarlógin var tann strangasta í heiminum, m.a. tí bert líkningarvaldið hevur loyvi at nýta P-talið og at samankoyra skrár.

Hóast hetta hevur løgtingið síðani 1984 gjørt fleiri viðtøkur, sum hava víðkað um nýtsluna av P-talinum til eisini at fevna um annað enn skattlig viðurskifti.

Í 1987 gjørdi løgtingið broytingar í løgtingslógini um landsskatt og kommunuskatt, sum hava við sær, at allar inn- og útlánskonti í føroysku peningastovnunum skulu skrásetast við P-talinum hjá kontohavaranum.

Hesar broytingar kunnu, hóast tær viðvíkja skatta-viðurskiftum, ikki metast at samsvara við grundhugsanina í skrásetingarlógini, við tað at trygdin hjá borgarunum viðvíkjandi samkoyring av skráum verður tikin burtur.

Vit her í Føroyum eiga at vera meira ansin enn onnur í slíkum viðurskiftum, tí sammett við okkara grannalond gevur lóggávan hjá okkum borgarunum lítlan møguleika at fáa innlit í almenna fyrisiting og mál, ið viðvíkja einum sjálvum.

Vit hava ongar lóggávur svarandi til tær, ið eru galdandi í eitt nú Danmark, sum tryggja borgarunum upplýsingar um, hvørji viðurskifti og upplýsingar tað almenna nýtir í sambandi við málsviðgerð, og vit hava hvørki eina lóg um almennu fyrisitingina ella eina umboðsmannaskipan.

Hetta vísir, at rættartrygdin hjá tí einstaka, tá talan er um almenna fyrisiting, ikki er lógarbundin og harvið rættiliga lítil.

Afturat hesum kemur eisini, at vit liva í einum lítlum landi, og kann hetta hava við sær, at upplýsingar um tann einstaka kunnu lættari koma í hendurnar á óviðkomandi.

Øll hesi viðurskifti gera, at nýtslan av P-talinum sum samlikningaramboð er rættiliga vandamikil og ger rættartrygdina hjá tí einstaka enn meira óryggga.

Minnilutin tekur undir við uppskotinum til samtyktar hjá Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og fiski vinnuflokki, men heldur tó, at í fyrsta lagi er rættari at gera broytingar í løgtingslóg nr. 54 frá 8. mai 1987, sum tekur burtur ásetingarnar um, at borgarar landsins skulu láta P-talið til peningastovnarnar, og setir fram soljóðandi

u p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 54 frá 8. mai 1987 um landsskatt og kommunuskatt verða hesar broytingar gjørdar:

1) Í § 120 a, 1. stk. verður "og upplýsingar, sum nevndir eru í § 120 b, 2. stk." strikað.
2) Í § 120 b, 1. stk verður "uttan at biðið verður um tað" strikað.
3) § 120 b, 2 stk. verður strikað.
4) § 120 b, 3. stk. verður 2. stk. og "og 2." verður strikað.
5) § 120 b, 4. stk. verður 3. stk., og "1.-3. stk." verður broytt til "1.-2. stk."

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 54 af 8. mai 1987 om landsskat og kommuneskat foretages disse ændringer:

1) I § 120 a, stk. 1 udgår "og oplysninger, som nævnt i § 120 b, stk. 2".
2) I § 120 b, stk. 1 udgår "uden at anmodet er derom".
3) § 120 b, stk. 2 udgår.
4) § 120 b, stk. 3 bliver stk. 2 og "og 2" udgår.
5) § 120 b, stk. 4 bliver stk. 3, og "stk. 1-3" ændres til "stk. 1-2".

6) § 120 b, 5. stk. verður 4. stk., og "smbr. 4. stk." verður breytt til "smbr. 3. stk."

7) § 120 b, 6. stk. verður 5. stk.

8) § 120 c, "stk. 1-2-3 og 4" verða strikað

9) § 120 d verður strikað.

10) Í § 120 g verður "c" strikað.

11) Í § 120 h verður "uttan at biðið verður um það." strikað.

12) Í § 120 j verður "uttan at biðið verður um það" strikað.

13) § 120 k verður "herundir persónta1" strikað.

14) § 120 l verður "1-3. stk." breytt til "1.-2. stk."

15) § 120 m verður strikað.

§ 2.

16) § 2, 4. og 5. stk. verða strikað.

6) § 120 b, stk. 5 bliver stk. 4, og "jfr. stk. 4" ændres til "jfr. stk. 3".

7) § 120 b, stk. 6 bliver stk. 5.

8) § 120 c, "stk. 1-2-3 og 4" udgår.

9) § 120 d udgår.

10) I § 120 g udgår "c".

11) I § 120 h udgår "uden at anmodet bliver derom".

12) I § 120 j udgår "uden at anmodet bliver derom".

13) § 120 k udgår "herunder personta1".

14) § 120 l ændres "stk. 1-3" til "stk. 1-2".

15) § 120 m udgår.

§ 2.

16) § 2, stk. 4 og 5 udgår.

17) § 2, 6. stk. verður 4. stk.
18) § 2, 7. og 8. stk. verða strikað.
19) § 2, 9. og 10. stk. verða 5. og 6. stk.
20) § 2, stk. 11 verður strikað.

17) § 2, stk. 6 bliver stk. 4.
18) § 2, stk. 7 og 8 udgår.
19) § 2, stk. 9 og 10 bliver stk. 5 og 6.
20) § 2, stk. 11 udgår.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) førir annars hesi sjónarmið fram:

Kristiligi fólkaflokkurin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur hevur sum kunnugt lagt uppskot fram á tingi, har álagt verður landsstýrinum beinanvegin at taka neyðug stig til, at borgarar landsins sleppa undan at láta peningastovnunum v.m. P-talið.

Flokkurin vil við hesum vísa á, at tað er alneyðugt at seta trygd borgarans fram um at innføra eina skipan, har tað sambært skriv frá landsstýrinum og líkningarráðnum dagfest 22. november 1989 verður sagt, at endamálið við p-talsskipanini í hesum føri er: "bert at fremja eina lagaligari loysn fyri vanligum líkningararbeiði".

At fólk kenna seg ótrygg orsakað av hesari skipan, sum ætlanin er at seta í verk 1. juni 1990, bera tær umleið 9.500 nótmælisundirskriftirnar klárliga boð um.

Av góðum grundum hava nógvir ivaspurningar tikið seg upp í samband við P-talið, og er ein av hesum, hvørt tað er juridiskt haldbart, at konti hjá teim, ið ikki innlata P-talið, verða stongdar, soleiðis sum landsstýrið ætlar. Tað er nógv, ið týðir uppá, at hetta er at ganga ognarrættinum hjá ti einstaka borgaranum ov nær, og er beinleiðis í stríð við sjálva grundlógina.

Ger landsstýrið álvara av sínum ætlanum, so merkir

hetta, at borgarin kemur at kenna revsingina soleiðis, at hann við einari stongdari bankakonto ikki hevur møguleika longur fyri at liva eina náttúrliga tilveru her á landi.

Hvat loyvdari nýtslu av P-talinum viðvíkir her á landi, má ásannast, at allir flokkar á tingi á ymiskan hátt hava gjørt seg sekan í at loyva P-talsnýtsluni. Hin vegin vísir tað seg eisini, at allir flokkar á ymiskan hátt hava mótmælt júst P-talsnýtsluni. Tí er tað burturvið at brigda hvørjum øðrum, men heldur er tað umráðandi, at allir flokkar í dag standa saman um at fremja umtalaðu broytingar havandi trygd borgarans fyrst og fremst í huga.

Hvat viðurskiftunum við peningastovnarnar/skattavaldið viðvíkir er tað ikki neyðugt við P-talinum, og vilja vit heldur vísa á tann møguleika, at allir peningastovnarnir lata sínum viðskiftafólki allar kravdar upplýsingar í einum bravi, sum skattaborgarin kann senda inn saman við sjálvuppgávuni. Á henda hátt verður ikki talan um nakra samankoyring av skráum, og heldur ikki on-line atgongd til tær upplýsingar, sum peningastovnarnir hava latið. Hetta er stórt sæð, soleiðis sum skipanin virkar í dag.

Minnilutin er av teirri áskoðan, at fellur upprunauppskotið, so eigur landsstýrið at taka stig til, at freistin fyri at geva peningastovnunum P-talið verður útsett, og setir tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at útseta freistina at geva peningastovnunum v.m. P-talið.

Sami minnilutin metir spurningin viðvíkjandi P-talinum av slíkum týdningi, at um uppskotið hjá minnilutanum (Tordur J. Niclasen og Maritu Petersen) fellur, upprunauppskotið frá Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki fellur, og uppskotið til samtyktar um at útseta freistina eisini fellur, eigur hetta mál at avgerast við einari fólkaatkvøðu.

At Føroya fólk hevur tikið undir við uppskotið okkara um at áleggja landsstýrinum beinanvegin at taka neyðug stig til, at borgarar landsins sleppa undan at lata peningastovnunum P-talið verður við gleði óasannað og bera tær mongu mótmælisundirskriftunum, sum eru komnar løgtinginum í hendi prógv um hetta.

Verða hesar undirskriftir ikki tiknar til eftirtektar, so eigur Føroya fólk sjálvt at fáa loyvi at avgera, hvørt P-talsskipanin skal koyra soleiðis, sum landsstýrið ætlar at seta í verk 1. juni, ella um hon skal avtakast.

Einasti háttur fyri at fáa hetta ágreiniliga at vita, er at spurningurin fer út til fólkaatkvøðu.

Samsvarandi hesum verður tí sett fram soljóðandi

u p p s k o t

til

løgtingslóg um fólkaatkvøðu.

§ 1. Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri fólkaatkvøðu um ætlaða skráseting av P-talinum í peningastovnunum v.m., áðrenn skipanin verður sett í verk. (Løgtingslóg nr. 54 frá 8. mai 1987 um landsskatt og komm-

lagtingslov om folkeafstemning

§ 1. Der pålægges landsstyret at sørge for folkeafstemning vedrørende den planlagte registrering af P-tallet i pengeinstitutterne m.m., før ordningen iværksættes. (Lagtingslov nr. 54 af 8. maj 1987 om

unuskatt.)	landsskat og kommuneskat.)
2. stk. Verður ikki meiriluti fyri at seta skipanina í verk, fellur kravið til borgaran um at lata peningastovnunum v.m. P-tali burtur.	Stk. 2. Opnås der ikke flertal for at iværksætte ordningen, bortfalder kravet til borgeren om at indlevere pengeinstitutterne m.m. P-tallet.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.	§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Vísir tað seg, at hetta uppskotið heldur ikki vinnur frama, má ásannast, at sitandi samgonga hevur vanvirt ein stóran part av føroyska fólkinum og tí eigur at leggja frá sær.

Sitandi samgonga hevur vist eitt so vánaligt áralag, sum eingin onnur samgonga áður hevur, umframt at livilíkindini her á landi eru versnað í so stóran mun, at fólk ongan annan útveg siggja sær enn í stóran mun at rýma av landinum.

Hini, sum eftir verða, mugu knógva undir stórum skatta- og avgjaldsbyrðum umframt at merkja nívandi arbeiðsloysi.

Tiltøkini hjá landsstýrinum, sum skuldu endurreisa búskapin hava ført við sær, at skattainntøka landskassans verður í hundraðtalsmilliónum, umframt at fiskivinnunni kemur at tørva yvir 100 milliónir kr. fyri at fáa hjólini at mala.

Eisini alivinnuni tørvar fígging.

Alt hetta er bert eitt prógv um, at sitandi samgonga fullkomiliga er óarbeiðstør, og hóast ávísar broytingar í ávísum flokkum, má ikki roknast við, at hon finnur áralagið, tá hon enn ikki hevur funnið tað hóast nærum eitt heilt ár er gingið, síðan hon varð skipað.

Føroya fólk hevur uppibori ð og hevur krav upp á eina samgongu, sum virkar, eina samgongu, sum kann skipa soleiðis fyri, at her gerst liviligt aftur á klettunum, og eitt landsstýri, sum er ført fyri at stýra á ein slíkan hátt, at verkamaðurin, barnafamiljurnar, pensjónisturin ikki verða tey, ið

skulu bera tær tyngstu byrðarnar.

Landsstýrissamgongan hevur av sonnum prógvað sítt maktarloysi, og er tað gagnligast fyri hana sjálva og føroyska fólkið, at hon nú leggur frá sær, og tí setir minnilutin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtykkt

Vegna løgtingsins restandi álit á sitandi landsstýri verður álagt løgmanni at útskriva nýval at vera í tíðarskeiðinum 1. - 15. september 1990.

RÆTTARNEVNDIN, 28. mai 1990.

Jógvan Durhuus Marita Petersen John Petersen

Tordur Niclasen Eilif Samuelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

Tlf. 11080 . Telex 81310 lagns fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Afgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

27. mars 1990

F. t. j. nr. (at tilvísa í svari) 625-1

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 93/1989: Broytingar í rentulógini.

U p p s k o t

til

samtyktar

Eftir § 8 í lóg nr. 618 frá 19. desember 1984 "om ændring af lov om renter ved forsinket betaling, forsikringsaftaleloven m.v." verða §§ 1, 2 og 3 í hesi lóg at seta í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Sorinskrivaranum hevur í skrivi dagfest 16. januar 1990 heitt á landsstýrið um at fáa rentulógina broytta soleiðis at morarentan verður hækkað.

Í løtuni er morarentan tann sama sum diskontoin ella 7%.
Frá tí, at løgtingið í 1981 avgjørdi, at rentan í Føroyum fyri ov seina gjalding ikki skuldi verða tann sama sum í Danmark, nevniliga diskontoin + 2%, men bert diskontoin og við teirri grundgeving, at útlánsrentan í Føroyum tá var nakað lægri enn í Danmark, er hent tað, at diskontoin nú er munandi lægri enn útlánsrentan í Føroyum.

Í Danmark er komið frám til, at tann upprunaliga rentan, ið ásett varð í rentulógini ikki veitti kredittveitaranum fulnað fyri

útreiðslurnar, og varð morarentan tí í 1984 hækkað til diskontoina + 6%.

At morarentan er so lág hevur ført við sær, at tað sýnist sum skuldarar nýta rentufyrimunin til ikki at rinda sína skuld, sum kredittgrundarlag, í staðin fyri at hava t.d. ein kassakreditt. Hetta hevur ført við sær, at borgarligu málini við Føroya rætt eru ógvuliga nógv í tali. Í 1989 vóru tey umleið 6.500, sum er meira enn dupult so nógv sum í eini tilsvarandi rættardømi í Danmark.

Sorinskrivarin metir eisini, at tað er óheppið, at rættareind ikki er á hesum øki, tá tað í nógvum førum er ivasamt, um føroysk ella donsk rentulóggáva skal nýtast.

Í Grønlandi er lógin frá 1984 um hækking av morarentuni sett í gildi.

Hjálagda lógaruppskot broytir 6 ymiskar lógir, men viðvíkja bert 3 av teimum ikki yvirtikin málsøkir, nevniliga lóg nr. 638 frá 21. desember 1977 "om renter ved forsinket betaling m.v.", lóg nr. 129 frá 15. apríl 1930 "om forsikringsaftaler" og lóg. nr. 275 frá 9. juni 1982 "om køb på kredit", og skulu sostatt bert §§ 1, 2 og 3 setast í gildi fyri Føroyar.

Í lógini er eisini ásett, at løgmálaráðharrin annaðhvørt ár aftaná samráðing við danska tjóðbankan og búskaparmálaráðið kann broyta rentuna. Hetta merkir, at rentubroyting í framtíðini kann ásetast við kunngerð.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/ Jalgrim Hilduberg

JAVNAÐARFLOKKURIN

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingsmál nr. 94/1989: viðvíkjandi fíggjarligu viðurskiftunum hjá teimum lesandi í Føroyum.

Heitt verður á landsstýrið um at kanna fíggjarligu viðurskiftini hjá teimum lesandi í Føroyum - við serligum atliti til umstøðurnar á arbeiðsmarknaðinum, og at virka fyri, at stuðulin til tey lesandi verður á slíkum støði, at øll uttan mun til inntøku fáa høvi til útbúgving.

Viðmerkingar:

Í seinastu viku samtykti samgongan at broyta løgtingslógina um útbúgvingarstuðul soleiðis, at stuðulin til tey, ið lesa, verð lækkaður.

Hóast upphæddirnar á hesum lækkingum - í sjálvum sær - ikki sýnast so stórar, so gera hesar lækkingar kortini stóran mun, tí so lítið er at taka av.

Hetta royndu tey ungu undir útbúgving eisini at vísa á, meðan málið var fyri í løgtinginum, bæði skrivliga og við møtmælisfundum.

Tey vístu á, at fólk undir útbúgving ikki hava somu møguleikar at vinna sær nakað av peningi við síðuna av sum áður, tí umstøðurnar á arbeiðsmarknaðinum eru so nógv versnaðar.

Undir viðgerðini av málinum varð eisini víst á, at hin føroyski parturin av stuðulsveitingini var alsamt minkandi, meðan hin danski parturin veksur.

Henda gongdin kann als ikki vera í lagi!

Um vit í framtíðini ætla at útbúgva tey ungu her í Føroyum, so verður neyðugt, at vit eisini geva teimum slíkar umstøður, at tey hava møguleika at lívbjarga sær, meðan tey lesa!

Tí setir javnaðarflokkurin fram hetta uppskot til samtyktar.

Á FØROYA LØGTINGI, 28. mars 1990

Jógvan A. Johannesen Atli P. Dam Henrik Old

Jákup Lindenskov Marita Petersen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

Á l i t

f

løgtingsmáli nr. 94/1989: Viðvíkjandi fíggjarligu viðurskiftunum hjá heimum lesandi í Føroyum.

Málið er framlagt av Javnaðarflokkinum tann 28. mars 1990 og eftir 1. viðgerð 3. apríl beint í mentannar- og skúlanevndina.

Uppskotið snýr seg um, at landsstýrið skal kanna fíggjarligu viðurskiftini hjá heimum lesandi í Føroyum við serligum atliti til umstøðurnar á arbeiðsmarknaðinum og at virka fyri, at stuðulin til tey lesandi verður á slíkum støði, at øll uttan mun til inntøku fáa høvi til útbúgving.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og ein minnilluta.

Meirilutin (Eilif Samuelsen, Hergeir Nielsen og Jógvan á Lakjuni) vísir á, at málið um útbúgvingarstuðulin fyri stuttum er viðgjørt og avgreitt av løgtinginum. Sisini kann vísast á, at tingmál nr. 69/1989: Setan av nevnd at kanna og viðgera arbeiðaloysið, snýr seg um sama mál.

Meirilutin tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan A. Johannesen og Lasse Klein) tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 18. mai 1990

Eilif Samuelsen Hergeir Nielsen Jógvan á Lakjuni

Jógvan A. Johannesen Lasse Klein

Kristiligi Fólkaflokkurin
Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur

Føroya Løgting

Løgtingsmál nr. 95/1990: Um korini hjá familjum við børnum í Føroyum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta kanning í verk um korini hjá familjum við børnum í Føroyum og leggja fyri løgtingið á ólavsøku.

Viðmerkingar

Landsstýrið 1985-1988 legði seg eftir at føra eina familjupolitikk, ið kom serliga børnunum at gagni, sum er vón og framtíð okkara.

Núverandi landsstýrið tykist ikki hava tað somu áskoðan og hevur avtikið fleiri av teimum lógum, ið tá vóru samtyktar, og sigst hava ætlanir um uppaftur fleiri avmarkingar í almenna stuðlinum til barnafamiljur. Besta dømið er lógin um barnastyrk, sum er broytt so nógv, at hon nú bert er galdandi fyri eina lítlan part av børnunum og í veruleikanum má haldast at vera avtikin. Tað sama er at siga um játtanina á fíggjarlógina til barnsburðarhvíld, sum ætlingin er at broyta so, at hin heimaarbeiðandi mamman ikki longur skal fáa barsilsorlov við løn.

Hesi og onnur viðurskifti við teimum byrðum, ið løgd eru á alt fólkið, raka hús og heim og gera støðuna hjá familjum við børnum ótrygga.

Í Danmark hava teir eisini ført ein almennan sparípolitikk og eru nú komnir til, at familjur við børnum eru raktar nógv harðari, enn nakar hevði ætlað. Stjórnin her hevur tí samtykt at seta nakrar av teimum lógunum í gildi um barnastyrk, sum landsstýrissamgongan her í Føroyum avtekur og hevur ætlanir um til várs at hava eina almenna hoyring um korini hjá familjum við børnum og kanna, hvussu ið teir kunnu fáa arbeiði og familjulív at hanga betur saman og veita møguleikar til partvísa og skiftandi arbeiðstíð hjá foreldrum við børnum. Bústaðarviðurskiftini eru eisini ein týðandi táttur hjá familjum við børnum umframt samveran millum foreldur og børn, ið barnastyrkurin og barsilsorlovin við løn var ætlað at styrkja.

Á FØROYA LØGTINGI, 23. mars 1990

Niels Pauli Danielsen

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURÐS-OG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 96/1989: Viðvíkjandi víðkan av apotekvirksemi í Førovum.

U P P S K O T

til

samtyktar

"Álagt verður landsstýrinum at fara undir stovnsetan av apoteki í Eysturoynni"

Viðmerkingar:

Samkvæmt § 3 í løgtingslóg um apoteksverkið er tað landsstýrið, ið ger av, um apotek skulu setast á stovn, avtakast ella flytast.

Sum kunnugt eru trý apotek í Føroyum, harav Apotekið í Tórshavn skal nøkta medisintørv v.m. hjá umr. 37.000 av landsins íbúgvum.

Í Danmark er talið av íbúgvum pr. apotek 15400, í Svøríki 10000 og aðrastaðnis í Europa liggur talið umr. 4000-5000 íb./apotek.

Sostatt má sigast, at fólkatalið í Fø. orkar at bera eitt apotek afturat.

Kommunulæknarnir í Eysturoynni hava fyri tíð síðan gjørt vart við tørvin fyri apoteki í oynni, tó uttan at nakað ítøkiligt er hent í málinum.

Apotekverkið umsetur fyri umr. 60 mió. kr. árliga og tá hugsað verður um, at góð 20% av landsins íbúgvum eru búsitandi í Eysturoynni, so má ásannast og takast til eftirtektar, at júst hesi eiga sín stóra part í umtalaða umsetningi.

Tá bæði fólkagrundarlag eins væl fíggjarligt grundarlag er til staðar fyri apoteki í Eysturoynni, má tað metast rímiligt, at farið verður nú undir stovnsetan.

Á FØROYA LØGTINGI 3.apríl 1990

639

1

Løgtingsmál nr. 96/1989: Viðvíkjandi viðkan av apoteksvirksemi í Føroyum.

Málið er framlagt av Kristiligu fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 5. apríl 1990 og eftir 1. viðgerð 19. apríl beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini tilkallað Jákup Hareldsen, landsapotekara. Hann greiddi nevndini frá apoteksvirksemunum í Føroyum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirilutа og ein minniluta.

Meirilutin (Petur Reinert, Flemming Mikkelsen, Jógvan á Lakjuni og Jákup Lindenskov) vísir á, at apoteksvirksemið í Føroyum er skipað við trimum apotekum, við depotum til bygdirnar og møguligan heilivág í fleiri bygdum eftir tørvi, handkeypssølum og møguleikum hjá kommunulæknunum at hava heilivág liggjandi, og skipanin við Postverki Føroya um medisinpakkar ger, at fólk fáa heilivágin skjótari og ódýrari tíð.

Upplýst er frá nevndini, at apoteksverkið skipar fyri økjum fyri teimum fólkum, ið umsita handkeypssølurnar í landinum, og at apoteksverkið vil í framtíðini leggja uppaftir støðugt at hækka prísin á heilivági. Út frá hesum tekur meirilutin undir við málinum og setur einki uppskot fram.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) vísir á áheitanina frá teimum 6 kommunulæknunum í Eysturoynni (Pól J. í Horni, Pól Olsen, Sigvald Kristiansen, Andrias Petersen, Sverri Lamhauge og Petur Reinert) dagfest 27. november 1985, um tað

heyðuga í ti at táa eitt apotek sett á stovn í Eysturoynni. Hesir læknar umboða eitt ókt, har 11.000 fólk búgva. Eisini vísir samt minniluti á, at tað hevur ongan eykakostnað tyri landskassan ella apoteksverkið, men heldur ókir um vinningin, um apotek verður sett á stovn í Eysturoynni. Tað er upplýst, at apoteksverkið í 1989 hevði eitt samlað yvirskot uppá 5 mió. kr. Harumframt ókir eitt apotek í Eysturoynni munandi um tænastustøðið sum allskonnur miðsøgading. Eitt nækkað tænastustøði má vera endamálið eisini hjá apoteksverkinum.

Ti tekur minnilutin undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

ALMANNA- OG HEILSUNEVND_N, 18. mai 1990.

Petur Reinert Flemming Mikkelsen Jógvan á Lakjuna

Jákup Lindenskov Niels Pauli Danielsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tl. 11080 . Telex 81180 tinghs fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Ferðaskrivstovan: Kl. 10—15. Ferðagarðar stongd

2. april 1999

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 508-7

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 97/1989: Veiting av ríkisborgararætti.

U p p s k o t

til

samtykt

Løgtingið samtykkir

1) at lóg nr. 709 frá 22. november 1989 um veiting av ríkisborgararætti kann verða lýst at galda fyri Føroyar.
2) at spurningurin um ígildisseting av ríkisborgaralógum ikki longur verður at leggja fyri løgtingið, men kann avgreiðast av landsstýrinum einsamalt,
3) at góðkenna at innanríkismálaráðharrin undantekur ríkisborgaralógir fyri lýsing við fullum orðaljóði í Kunngerðablaðnum.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at nevnda lóg verður lýst at galda fyri Føroyar.
Eftir lógini verður eisini veitt 7 persónum búsitandi í Føroyum ríkisborgararætt.

Landsstýrið hevur fingið fyrispurning frá løgtingsskrivstovuni, um tað metir tað vera beyðugt, at ríkisborgaralógir verða lagdar

fyri løgtingið, og hevur ríkisumboðið umrøtt henda sama spurning.

Tá ríkisborgaralógir eftir sínum innihaldi ersini eru galdandi fyri Føroyar og bert vísa hvørjir persónar longu hava fingið ríkisborgararætt, metir landsstýrið tað ikki vera neyðugt, at hesar lógirnar verða lagdar fyri løgtingið.

Tá soleiðis er, metir landsstýrið, at tað heldur ikki er neyðugt, at hesar lógirnar verða lýstar við fullum orðalagi í Kunngerðablaðnum, men bert við heiti og undirskrift, soleiðis sum fyrisett í lóg nr. 735 frá 6. desember 1989 "om kundgørelse af love, anordninger og bekendtgørelser på Færøerne".

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 97/1989: Veiting av ríkisborgararætti.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 3. apríl 1990 og eftir 1. viðgerð 5. apríl beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Durhuus, Poul Michelsen, Eilif Samuelsen og Tordur Niclasen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Marita Petersen) tekur undir við punktunum 1 og 3 í uppskotinum hjá landsstýrinum. Viðvíkjandi punkti 2 í uppskotinum er støða minnilutans, at so leingi ongar broytingar eru gjørdar í okkara stýrisskipan, er eingin orsøk til at broyta mannagongdina í málum um ríkisborgararætt, og tí kann minnilutin ikki taka undir við, at ríkisborgaralógir ikki skulu leggjast fyri løgtingið til góðkenningar.

RÆTTARNEVNDIN, 24. apríl 1990.

Jógvan Durhuus Marita Petersen Poul Michelsen

Tordur Niclasen Eilif Samuelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

T.f. 11080 . Telex 81340 tingms fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. leygardagur stongd

3. apríl 1990

F. L. nr. 520-2-1

JH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 98/1989: Yvirtøka av navnalóggávuni.

U p p s k o t

til

samtykt

Løgtingið samtykkir at yvirtaka navnalóggávuna sum føroyskt sermál.

Viðmerkingar:

Tá ið sitandi landsstýrissamgonga varð skipað, setti hon sær m.a. sum mál at yvirtaka navnalóggávuna. Ætlanin um at fáa eina føroyska navnalóggávu er gamalt mál á tingi, men hevur hingartil ikki vunnið frama.

Í tingmáli nr. 47/1976 setti løgtingið eina 3-manna uttanringanevnd at gera uppskot um nøvn, stavseting av nøvnum og skrásetting av nøvnum.

Álitið frá nevndini varð viðgjørt í løgtingsmáli nr. 145/1983 har løgtingið samtykti at áleggja landsstýrinum at fyrireika nýggja navnalóggávu.

Í heimastýrislógini er navnalóggávuøkið hvørki nevnt sum A-mál ella B-mál og hevur tí verið hildið, at navnalóggávan sostatt ikki kundi yvirtakast, uttan at heimastýrislógin fyrst varð

broytt.

Brævaskift er síðani farið fram við ríkisstýrið um møguleikarnar fyri at fremja broytingar, ið navnalóggávunevndin hevði skotið upp í sínum áliti.

Hugsað varð um møguleikan fyri at fremja ætlaðu broytingarnar við at seta donsku navnalógina nr. 193 frá 29. august 1981 í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan við teimum broytingum, sum mettar vóru neyðugar vegna serligu føroysku viðurskiftini.

Í mun til galdandi reglur vóru høvuðsbroytingarnar eftir uppskotinum hjá navnalóggávunevndini hesar:

1) At navnið skal vera í samljóð við føroyskar málreglur og at gjørdur verður leiðbeinandi listi við viðurkendum navnum. Undantak skal í serligum førum kunna veitast fólki úr øðrum londum, ið ikki ætla at vera verandi í Føroyum.
2) At eftirnavnið annaðhvørt kann vera eftirnavnið hjá foreldrunum ella fornavn móður ella faðirs í hvørsfalli við -dóttir ella -son viðhefttum í samsvari við kyn barnsins.
3) At einkarrætturin fellur burtur til eftirnøvn, ið eru samansett av fornavni + sonur ella dóttir og at tað heldur ikki skal lata seg gera at hava einkarrætt til at nýta heimstaðarnavn ella húsanøvn sum eftirnavn, um so er, at onnur halda seg hava líka góðan rætt til at nýta ávvarðandi navn.

Í september 1984 boðaði ríkisstýrið frá, at tað aftand nærri kanningar ikki metti, at danska navnalógin frá 1981 gav heimild til við kongaligari fyriskipan at gera allar tær broytingar, sum skotnar vóru upp í álitinum frá navnalóggávunevndini.

Síðani hevur løgmálaráðið arbeitt við einum uppskoti til eina rammulóg at leggja fyri løgtingið og fólkatingið, soleiðis at heimastýrið kundi yvirtaka fyrisitingina og regluásetingina á navnaøkinum.

Aftaná at løgmálaráðið hevur kannað málið nærri, er tað komið fram til, at heimastýrislógin kann tulkast soleiðis, at lógin

gevur høguleika fyri, at navnalóggavan kann yvirtakast sum sermál.

Forsætismálaráðið er samt í tulkingini hjá løgmálarnevnum um, at einki skuldi verið til hindurs fyri, at økið verður yvirtikið sum føroyskt sermál, smb. viðhefta skriv frá ríkisumboðsmanninum dagfest 7. februar 1990.

Galdandi navnalóggáva í Føroyum er ríkislóg nr. 39 frá 22. April 1904 við seinni broytingum.

Beinanvegin málsøkið er yvirtikið, er ætlanin at fara undir at gera uppskot til eina nýggja føroyska navnalóg. Til hendan er samtykt, má fyrisitingin aftana yvirtøkuna framvegis fara fram eftir lógini frá 1904.
+ 1 skjal

Signar Hansen
landsstýrismaður

/Jalgrim Hilduberg

RIGSOMBUDSMANDEN PÅ FÆROERNE
Postboks 12 - FR-110 Tórshavn
Telf. (009-298) 11040

7. februar 1990
Dato

J. nr. 30-10-19/1987
Bedes anført ved alle henvendelser

Færoernes landsstyre,
Postboks 64,
110 Tórshavn.

bek/im

Med henvisning til en tidligere brevveksling meddelte landsstyret i en skrivelse af 11. juli 1985 (j.nr.520-2-1), at man ønskede tilvejebragt en løsning af spørgsmålet om en særlig færøsk navnelovgivning gennem udfærdigelse af en folketingslov, der som rammelov for Færoerne i videst muligt omfang overlader den nærmere regelfastsættelse og administration på navneområdet til de færøske myndigheder.

Navnelovgivningen er som bekendt ikke nævnt direkte i hjemmestyrelovens bilag A eller B, og de forskellige overvejelser og undersøgelser i sagen har derfor først og fremmest drejet sig om, hvorledes et forslag til rammelov som nævnt ovenfor mest hensigtsmæssig ville kunne udformes.

Spørgsmålet har i slutningen af 1989 påny været drøftet med Justitsministeriet, og ministeriet har her indtaget den holdning, at man vil finde det principielt uheldigt, hvis det skulle være nødvendigt at gennemføre en særlig bemyndigelseslov på dette område.

Efter Justitsministeriets opfattelse bør navnelovgivningen overtages af hjemmestyret som et særanliggende, og ministeriet finder, at hjemmestyreloven kan fortolkes således, at loven giver mulighed herfor. Der peges i denne forbindelse på, at f.eks. folkeregisterspørgsmålet er et særanliggende, og at også områder inden for folkekirken efter forhandling kan overtages som særanliggende.

Fortolkningen af hjemmestyreloven, for så vidt angår hjemmestyrets muligheder for at overtage sagsområder, har som udgangspunkt haft, at kun de sagsområder, som udtrykkeligt var nævnt i lovens liste A og B, kunne overtages som særanliggende i medfør af lovens § 2. I de senere år har Statsministeriet imidlertid - også ud fra en helhedsvurdering af hjemmestyreordningen - fundet det hensigtsmæssigt i et vist omfang at anlægge en bredere fortolkning af hjemmestyrets muligheder for overtagelser, eksempelvis hvor der er tale om et sagsområde, som er en naturlig bestanddel af en større samling sagsområder, der i øvrigt er færøske særanliggender.

Afgrænsningen af det område, der kan overtages, må i disse tilfælde ske efter forhandling mellem Statsministeriet, det pågældende ressortministerium og hjemmestyret.

Statsministeriet deler, på baggrund af den ovenfor omtalte fortolkning af hjemmestyrelover, Justitsministeriets foran refererende opfattelse, hvorefter der ikke vil være noget til hinder for, at hjemmestyret overtager navnelovgivningen som færøsk særanliggende.

Man skal på denne baggrund anmode om at modtage landsstyrets holdning hertil.

Med venlig hilsen

Bent Klinte

9 FEB. 1990

F. L. j. nr. 52c - 2 - 1 42

549

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 98/1989: Yvirtøka av navnalóggávuni.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 3. apríl 1990 og eftir 1. viðgerð 19. apríl beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

RÆTTARNEVNDIN, 24. apríl 1990.

Jógvan Durhuus Marita Petersen Poul Michelsen

Tordur Niclasen Eilif Samuelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

Tlf. 11080 , Telex 81380 dinorm fa , Telefax 14943 , Postboks 64
Åbningstider: Kl. 10—15, lovgivning stængt

3. april 1990

F. L. j. nr. 1300-6-3

JN/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 99/1989: Broyting í lærlingalógini.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskifti.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om lærlingeforhold.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 um lærlingaviðurskifti, sbr. lógarkunngerð nr. 56 frá 15. august 1961, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986, verður gjørd hesa broyting:

§ 13, stk. 3, verður orðað soleiðis:

"Landsstýrið ásetir gjald fyri sveinaroyndir og hvør skal gjalda hetta."

§ 1.

I lagtingslov nr. 29 af 12. oktober 1954 om lærlingeforhold, jfr. lagtingslovbekendtgørelse nr. 56 af 15. august 1961, som senest ændret ved lagtingslov nr. 30 af 7. april 1986, foretages følgende ændring:

§ 13, stk. 3 affattes således:

"Landsstyret fastsætter gebyr for svendeprøver og af hvem dette skal betales."

§ 2.

Hesa lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Føroya Læruráð hevur í skrivi dagfestum 4. desember 1999 biðið um loyvi landsstýrisins til at hækka gjaldið fyri sveinaroyndir úr 200 kr. uppi 2.000 kr., sum er hægri upphædd enn útreiðslurnar av royndini.

Í galdandi lóg er bert heimild at áleggja pørtunum innan viðkomandi vinnu og landsstýrinum at rinda gjaldið.

Skotið verður tí upp, at landsstýrið fær heimild til at áseta gjaldið uttan avmarking til útreiðslurnar av sveinaroyndum.

Viðkomandi partar á arbeiðsmarknaðinum hava tikið undir við ynski læruráðsins um at gjaldið av sveinaroyndum verður hækkað.

J. Sundstein
løgmaður

/ Klaus Hermann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 99/1989: Broyting í lærlingalógini.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 3. apríl 1990 og eftir 1. viðgerð 5. apríl beint í arbeiðaramálanevndina.

Málið snýr seg um at hækka gjaldið fyri sveinaroyndir úr 200 kr. upp í 2.000 kr. Hetta er meira enn veruligi kostnaðurin av royndini.

Undir 1. viðgerð kom fram, at orsøkin til, at upphæddin skal verða meira enn veruligi kostnaðurin, er, at meirinntøkan skal tíggja nýtt starv hjá námsfulltrúa hjá læruráðnum.

Spurningurin um nýnormering hjá námsfulltrúa eigur at verða viðgjørdur í samband við løgtingsfíggjarlógina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin í nevndini (Jákup Lamhauge, Karin Kjølbro og Eliesar Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til, at upphæddin verður tað, sveinaroyndin kostar, og at hon verður goldin av vinnuni, harumframt ger meirilutin vart við, at nýnormering av námsfulltrúa eigur at verða viðgjørd í samband við løgtingsfíggjarlógina.

Ein minniluti (Tórbjørn Poulsen og Vilhelm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar til uppskot landsstýrisins at broyta lærlingalógina.

Sambært galdandi lóg skulu "útreiðslurnar av sveinaroyndunum verða býttar millum landskassan, meistara- og sveinafeløgini eftir reglum, sum landsstýrið setur eftir at hava samráðst við feløgini."

Landsstýrið hevur sostatt sambært galdandi lóg fullan rætt at áseta gjaldið fyri sveinaroyndina og at áleggja vinnuni at gjalda hetta, um so skal vera, og sum meirilutin í arbeiðaramálanevndini mælir til.

Minnilutin sær sostatt onga orsøk vera til at broyta galdandi lóg og setir einki uppskot fram.

ARBEIÐARAMÁLANEVNDIN, 16. mai 1990.

Karin Kjølbro Jákup Lamhauge Eliesar Arge

Vilhelm Johannesen Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 5. apríl 1990

F. L. j. nr. 1010-12-2-1
(at tilskila í svari)

Tlf. 11080. Telex 81310 tinghs fa. Telefax 14942. Postbox 64
Augnvísluna: Kl. 10—15, leygardag stongt
KlH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 101/1989: Broyting í løgtingslógini um dagpening.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening í sambandi við barnsburð og sjúku.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om dagpenge ved barsel og sygdom.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 25 frá 30. apríl 1987 um dagpening í sambandi við barnsburð og sjúku, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 78 frá 9. juni 1988, verða hesar broytingar gjørdar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:
"Kvinna, ið hevur átt, og sum kemur undir kapitul 6 í dagpeningalógini, tað er "Bekendtgørelse nr. 102 af 2. marts 1988 af Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel",

§ 1.

I lagtingslov nr. 25 af 30. april 1987 om dagpenge ved barsel og sygdom, som ændret senest ved lagtingslov nr. 78 af 9. juni 1988, foretages følgende ændringer:

1) § 1 affattes således:
"En kvinde, der har født, og som omfattes af kapitel 6 i dagpengeloven, d.v.s. Bekendtgørelse nr. 102 af 2. marts 1988 af Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel, har ret til supplementsdagpenge i henhold til denne lag-

hevur rætt til eykadagpening eftir hesi løgtingslóg, um so er, at dagpeningurin útroknaður eftir dagpeningalógini er minni enn helvtin av hægsta dagpeningi sambært § 10, stk. 3, í dagpeningalógini. Eykadagpeningurin er munurin millum dagpeningin hjá kvinnuni eftir dagpeningalógini og helvtin av hægsta dagpeningi sambært § 10, stk. 3, í dagpeningalógini."

2) Í § 2 verður orðini "hægsti dagpeningur" broytt til: "helvtin av hægsta dagpeningi".

tingslov, såfremt dagpenge udregnet efter dagpengeloven udgør mindre end halvdelen af dagpengenes højeste beløb i henhold til dagpengelovens § 10, stk. 3. Supplementsdagpengene udgør forskellen mellem den pågældende kvindes dagpenge i henhold til dagpengeloven og halvdelen af dagpengenes højeste beløb i henhold til dagpengelovens § 10, stk. 3."

2) I § 2 indføjes foran ordene "dagpengenes højeste beløb": "halvdelen af".

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. juli 1990.

Stk. 2. Kvinna, sum fær dagpening aftanat barnsburð, tá lógin fær gildi, heldur tó fram at fáa somu upphædd, sum áðrenn lógin fekk gildi, til viðkomandi barnsburðarhvíldarskeið er endað.

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. juli 1990.

Stk. 2. En kvinde, der ved lovens ikrafttræden modtager dagpenge efter fødsel, modtager dog fortsat samme beløb som før lovens ikrafttræden indtil afslutningen af pågældende barselshvileperiode.

Viðmerkingar:

Í samband við viðgerðina av fíggjarløgtingslógini 1990 er álagt landsstýrinum at koma við lógarbroytingum fyri at spara á almannaøkinum. Broytingarnar í lóg um barnastyrk eru framdar. Lógin um avtøku av lóg um serviðbót er til viðgerðar í tinginum í løtuni.

Viðvikjandi vanligari forsorg eru fastari praksis og nýggj arbeiðsreglugerð gjørd.

Eisini viðvikjandi dagpengaveitingum verður arbeitt við at gera strammari arbeiðsreglur.

Hetta lógaruppskot snýr seg um broyting av reglunum fyri daggpening í sambond við barnsburð.

Broytingin ger, at kvinnur, sum ikki hava inntoku (heimaarbeiðandi) og tær, sum regluliga bert hava lága inntoku, í staðin fyri fullan daggpening bert fáa hálvan daggpening.

Árligu útreiðslurnar av logtingsiógini eru umleið 20,5 mió. kr. Sparingin, sum stendst av uppskotinum, kann metast til o.u. 15 mió. kr. árliga, og sostatt um 7,5 mió. kr. í 1990.

J. Sundstein
løgmaður

/Klaus Hermann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 101/1989: Broyting í løgtingslóg um dagpening.

Málið er framiagt av landsstýrinum tann 5. apríl 1990 og eftir 1. viðgerð 19. apríl beint í almenna og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutа og ein minnilutа.

Meirilutin (Petur Reinert, Jógvan á Lakjuni og Suni Jacobsen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Jákup Lindenskov og Niels Pauli Danielsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, tí tað gev mun á kvinnum, ið eru við barn og setir heimaarbeiðandi og tímalønтar, ið ikki hava fulla arbeiðstíðina úti, verri fyri fíggjarliga um somu tíð, sum landsstýrið, tá talan er um tey fastlønтu, ger sáttmála, ið tryggjar hesum fulla løn í sambandi við barnsburð.

Fyriliggjandi uppskot er enn eitt dømi um sosial- og familjupolitikkin hjá landsstýrinum, ið tekur munandi frá teimum, sum hava meiri stuðul fyri neyðini enn onnur, og harmast minnilutin um at tann sosial- og familjupolitikkur, ið bygdur var upp í árunum 1985-88, verður miðvist brotin niður.

ALMANNA- OG HEILSUNEVNDIN, 25. mai 1990.

Petur Reinert Jógvan á Lakjuni Suni Jacobsen

Jákup Lindenskov Niels Pauli Danielsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,
TIf. 11080 . Telex 81310 lingos fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

23. april 1990

F. L. j. nr. 1501-2-3

KH/cr

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 103/1989: Fiskiveiði á ytru landleiðini.

U p p s k o t

til

broyting í løgtingslóg um fiskiveiði á landleiðini.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fiskeri på fiskeriterritoriet.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiðu á landleiðini verður gjørd hesar broytingar:

1) Navnið á lógini verður broytt til: "løgtingslóg um fiskiveiðu á ytru landleiðini."

2) § 1, fyrsta punktum verður broytt soleiðis:
"Ytra landleiðin er sjógvurin innan fyri linju, sum gongur 200 fjórðingar (1 fjórðingur = 1852 m) frá beinum grundlinjum og uttan fyri somu grundlinjur drignar gjøgnum hesi 12 støðini í til-

§ 1.

I lagtingslov nr. 3 af 29. marts 1978 om fiskeri på fiskeriterritoriet foretages følgende ændring:

1) Lovens navn bliver ændret til: lagtingslov om fiskeri på det ydre fiskeriterritorium."

2) § 1, første punktum ændres således:
"Det ydre fiskeriterritorium er farvandet indenfor en linie 200 sømil (1 sømil = 1852 m) fra lige basislinier og uden for de samme basislinier, der trækkes mellem følgende 12 punkter i den angivne

skilaðu raðfylgju:"

3) Sum nýtt stk. 2 í § 2 verður sett:
"Eisini er bannað fiskiførum, sum hava heimstað ella eru skrásett í fremmandum landi og fremmandum ríkisborgarum, at koma á føroyskt sjóøki ella í føroyska havn uttan í skaðaleysari gjøgnumsigling, um so er at tey hava brotið reglur fyri fiskiskapi uttan fyri føroysku landleiðina, sum skip skrásett í Føroyum sambært millumlanda avtalum, eru bundin at halda."

4) Stk. 2 verður stk. 3.

5) Sum nýtt stk. 2 í § 5 verður sett:
Stk. 2. Tryggingarfelagið, sum tikið hevur við ábyrgdartrygging fyri hund, sum elvt hevur skaða, er í endurgjaldsspurninginum at rokna sum partur í málinum og skal verða fráboðað til hvønn rættarfundin við freist eftir § 175 í rættargangslógini, sum galdandi er fyri vitnir í revsimálum.

Stk. 3. Er ákæra reist móti øðrum enn honum, sum eigur hundin, sum elvt hevur skaða, skal eisini hann, sum eigur hundin, verða innkallaður til hvønn rættarfundin við tilsøgn sum tilskilað í stk. 2. Reglan í § 9, stk. 2, tekur

§ 10. Hvis der rejses tiltal for nogen skadevoldende lovovertrædelse, der i henhold til § 8 kan medføre erstatningsansvar, skal der gives skadelidte lejlighed til at påstå erstatning. Hvis der ikke opnås forlig om erstatningen, skal erstatningspåstandene påkendes under sagen, selv om straf ikke pålægges tiltalte. Sådan påkendelse kan ske før eller efter afgørelsen af spørgsmålet om straf. Hvor erstatningskravet angår materiel skade og er af indviklet beskaffenhed, kan retten, efter at forlig forgæves er prøvet, nægte kravets forfølgning under straffesagen.

Stk. 2. Forsikringsselskabet, i hvilket der er tegnet ansvarsforsikring for den skadevoldende hund, anses for erstatningsspørgsmålets vedkommende som part i sagen og skal tilsiges til ethvert retsmøde med det varsel, som efter retsplejelovens § 175 gælder for vidner i straffesager.

Stk. 3. Er tiltalen rejst mod andre end den skadevoldende hunds besidder, skal tillige besidderen tilsiges til ethvert møde med det i stk. 2 nævnte varsel. Bestemmelserne

eisini við.

Stk. 4. Tá ið endurgjaldsspurningurin fellur til avgerðar í málinum, kann rætturin leggja á rættargangsbót og sakarkostnað eftir reglunum í kap. 30 í rættargangslógini, sum um málið var farið fram eftir reglunum um borgarlig mál. Sakarmálsvirðið verður í hesum føri ásett í dóminum.

§ 11. Verður revsimál skotið inn fyri hægri rætt, har avgerð um endurgjaldskrav er tikin, er einhvør, sum tá var partur í endurgjaldsspurninginum, eisini partur í málinum, sum skotið verður inn, um so er at endurgjaldsspurningurin fellur til avgerðar.

Stk. 2. Hevi eftir § 996 í rættargangslógini at skjóta inn søk eftir mannagongdini í borgarligum máli, stendur hvørjum opið, sum, tá ið tað ræður um endurgjaldsspurningin, var partur í málinum. Í spurningi at skjóta inn søk eftir § 10, stk. 1, er avgerð, sum er gjørd fyri seg í sektar- ella endurgjaldskravinum at skilja sum egin dómur. § 995,

i § 9, stk. 2, finder tilsvarende anvendelse.

Stk. 4. Når erstatningsspørgsmålet påkendes under sagen, kan retten i overensstemmelse med reglerne i retsplejelovens kapitel 30 pålægge rettergangsbøder og sagsomkostninger, som om sagen havde været behandlet i den borgerlige retsplejes former. Sagsgenstandens værdi fastsættes i så fald ved dommen.

§ 11. Ankes en straffesag, under hvilken erstatningsspørgsmålet er blevet påkendt, anses enhver, der for erstatningsspørgsmålets vedkommende har været part i den indankede sag, tillige som part under anken, for så vidt erstatningsspørgsmålet tages under påkendelse.

Stk. 2. Den i retsplejelovens § 996 omhandlede adgang til anke i den borgerlige retsplejes former står åben for enhver, der, for så vidt angår erstatningsspørgsmålet, har været part i sagen. I henseende til anke er en i medfør af § 10, stk. 1, sket særskilt påkendelse af straffe- eller erstatningspåstanden at betragte som selvstændig dom. Retsplejelovens

seinasta stk., í rættargangslógini fær ikki nýtslu í her umrøddu søkum.

§ 12. Sektaður verður tann, sum

1) ger brot á § 1, stk. 1, § 2, § 3, stk. 1, pkt. 1-4, § 3, stk. 6-9, § 5, § 6, stk. 1, § 7 ella § 8, stk. 2,
2) setur til viks boð, sum givin eru eftir § 4 ella § 6, stk. 2, ella
3) setur til viks treytir við einum loyvi.

Stk. 2. Undir somu sekt kemur hann, sum beitir hund eftir onkrum ella ger onki fyri at halda hundinum aftur, tá ið hann sær, at hann leggur eftir onkrum.

Stk. 3. Í forskriftum, sum givnar eru í § 1, stk. 2, kann sekt verða ásett fyri brot móti forskriftum. Sama sektin kann ásetast fyri at bróta reglur, sum landsstýrið hevur givið sambært § 3, stk. 5.

Stk. 4. Fyri brot, sum gjørd verða av partafeløgum, lutafeløgum, fognarfeløgum o.t. kann felagið verða sektað. Er brotið gjørt av kommununi ella kommunalum felagsskapi, kann kommunan ella tann kommunali felagsskapurin

§ 995, sidste stykke, finde ikke anvendelse i de her omhandlede sager.

§ 12. Med bøde straffes den, der

1) overtræder § 1, stk. 1, § 2, § 3, stk. 1, 1.-4.pkt., § 3, stk. 6-9, § 5, § 6, stk. 1, § 7, eller § 8, stk. 2.
2) tilsidesætter et i medfør af § 4 eller § 6, stk. 2, givet pålæg eller
3) tilsidesætter vilkår for en tilladelse.

Stk. 2. På samme måde straffes den, der hidser en hund på nogen eller undlader at holde sin hund tilbage, når han bemærker, at den overfalder nogen.

Stk. 3. I forskrifter, der udstedes i henhold til § 1, stk. 2, kan fastsættes straf af bøde for overtrædelse af forskrifterne. Samme straf kan fastsættes for overtrædelse af landsstyrets bestemmelser i henhold til § 3, stk. 5.

Stk. 4. For overtrædelser, der begås af aktieselskaber, andelsselskaber, anpartsselskaber eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar. Er overtrædelsen begået af en

verða sektað.

§ 13. Tær vanligu reglurnar um sekt og endurgjald og avlíving galda ikki fyri skaða, sum seyðahundur í felagshaga elvir seyði fyrstu og aðru ferð burtur í haga í felagshaga.

§ 14. Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1990.

Stk. 2. Tá ið lógin kemur í gildi, fara úr gildi fyriskipan nr. 88 frá 31. mars 1928, sum lóg nr. 127 frá 18. apríl 1925 um hundaskatt og um sekt og endurgjald elvt av hundi var sett í gildi í Føroyum við, løgtingslóg nr. 5 frá 18. mars 1955 og løgtingslóg nr. 18 frá 29. apríl 1959 um broyting og uppískoyti til fyriskipan nr. 88 frá 31. mars 1928, politiviðtøku fyri landkommunurnar í Føroyum frá 3. juli 1931 § 22, lóg nr. 172 frá 18. mei 1937 fyri Føroyar um stýri av høgum og rakstur §§ 32 og 33 og fyribils reglur nr. 14 frá 15. apríl 1947 um hundar.

kommune eller et kommunalt fællesskab, kan der pålægges kommunen eller det kommunale fællesskab bødeansvar.

§ 13. De almindelige regler om straf- og erstatningsansvar og aflivning gælder ikke for den skade, som en fælleshauges fårehund første og anden gang forårsager på får under fårerøgt i fælleshauger.

§ 14. Denne lov træder i kraft 1. apil 1990.

Stk. 2. Ved lovens ikrafttræden ophæves anordning nr. 88 af 31. marts 1928, hvorved lov nr. 127 af 18. april 1925 om hundeafgift samt om straf og erstatning forårsaget af hunde sættes i kraft på Færøerne, lagtingslov nr. 5 af 18. marts 1955 og lagtingslov nr. 18 af 29. april 1959 om ændring og tilføjelse til anordning nr. 88 af 31. marts 1928, politivedtægt for landkommunerne på Færøerne af 3. juli 1931 § 22, lov nr. 172 af 18. maj 1937 for Færøerne om haugers styrelse og drift §§ 32 og 33 samt midlertidig bestemmelse nr. 14 af 15. april 1947 om hunde.

Viðmerkingar:

1.1. Á landsstýrisfundi hin 6. apríl 1988 varð viðtikið, at ein nevnd verður sett at endurskoða reglurnar um hundar við hesum limum: landsdjóralæknin, landbúnaðarráðgevin, eitt umboð fyri landfútan og eitt umboð fyri sýslumenninar. Á landsstýrisfundi tann 6. mai 1988 viðtók landsstýrið eftir tilmæli, at djóraverndarfelagið skuldiava eitt umboð í nevndina.

Nevndin er sett soleiðis saman:
Áki Mortensen, landsdjóralækni (formaður)
Hanus Wardum, landsbúnaðarráðgevi
Mogens Nepper-Christensen, landfúti
Karsten Hansen, sýslumaður
Bergtóra Justinussen, djóraverndarfelagið
Anna María Fossaa, fulltrúi í landsstýrinum, er skrivari nevndarinnar.

Nevndin hevur havt 6 fundir.

1.2. Galdandi reglur um hundar

a) Fyriskipan nr. 88 frá 31. mars 1928, har lóg nr. 127 frá 18. apríl 1925 um hundagjald og um revsing og endurgjald fyri skaða elvdum av hundi verður sett í gildi í Føroyum við broytingum í løgtingslóg nr. 5 frá 18. mars 1955 og løgtinslóg nr. 18 frá 29. apríl 1959 og kunngerð nr. 70 frá 15. desember 1959 um ábyrgdartrygging fyri hundar Skjøl 1-4

Í fyriskipanini standa í §§ 1-8 nærri reglur um hundagjald í Tórshavnar kommunu og í teimum kommunum, sum sambært lógini hava sett í gjaldsreglurnar í gildi.

Í hesum kommunum eru reglurnar um hundagjald galdandi: Tórshavnar, Argja, Klaksvíkar, Vestmanna, Sandavágs, og

Tvøroyrar kommunu.

Eftir fyriskipanini skal ein og hvør, sum hevur hund í hesum kommunum, boða løgregluni ella sýslumanninum frá, áðrenn hundurin er 4 mánaðar gamal ella innan 1 mánaða eftir, at eigarin hevur fingið hundin ella er fluttur til kommununa. Tá fráboðað er, verður hundurin førdur inn í eina gerðabók, og fær nummar og tekn samsvarandi gerðabókini. Teknið skal vera bundið í helsi á hundinum.

Gjaldið, sum kommunan ber, er 20 kr. árliga fyri fyrsta hundin hjá einum húski, tó 5 kr. í Tvøroyrar kommunu. Fyri hundar undir 4 mánaðir og seyðahundar, tó ikki meir enn 2 hundar úr hvørjum húski, verður ikki goldið. Kommunan kann undir serligum umstøðum geva avsláttur ella eftirgeva gjaldið.

Eftir § 1 í fyriskipanini hevur tann, sum hevur hund, ið verður at fráboða eftir reglunum um gjaldskyldu, skyldu til at hava hundin ábyrgdartryggjaðan. Tá fráboðað verður, skal verða tilskilað, at ábyrgdartrygging er teknað. Í kunngerð nr. 70 frá 15. desember 1959 er tryggingarupphæddin sett til 100.000 kr.

Samsvarandi § 9 í fyriskipanini er ikki loyvt at hava hund, har eingin býr, uttan so at løgreglan gevur loyvi til tess.

Fyriskipanin hevur í § 11 ábyrgdar- og endurgjaldsreglur fyri tann, ið hevur hund gangandi leysan.

Tann, ið hevur hund, hevur ábyrgdina av, at hundurin ikki býtur sakleys fólk, skræðir klæðini sundur ella ger teimum skaða á annan hátt. Revsiábyrgdin ber sekt, og eigaranum kann verða álagt endurgjald fyri tann skaða, hundurin hevur elvt til, og harafturat endurgjald fyri svið og pínu.

Hevur hundur áður bitið fólk ella gjørt annan skaða, sí táverandi eigari er dømdur fyri ella hevur gjørt semju við tann skadda um, ella fer hundur sjálvur út á bøin og eltir ella bítur seyð, skal logregluovastin við sekt áleggja eigaranum at syrgja fyri, at hundurin verður avlívaður, tá ið hann alsamt ikki verður hildin hundin ella hildin inni ella hevur kjaftband.

Fyriskipanin hevur í § 12 eina revsiregiu fyri tann, sum beitir hund ella ikki heldur hundi aftur, tá ið hann sær, at hann leggur eftir onkrum.

b) Fyribils reglur nr. 14 frá 15 apríl 1947 um hundar
Skjal 5

Reglan ásetur, at í Tórshavnar kommunu er ikki loyvt at lata hund reika á gøtu, vegi, breyt ella oki, sum opin eru fyri almennari ferðslu, uttan at hann antin verður havdur í bandi ella er saman við fólki, sum hevur fult ræði á honum. Hundur er ikki undir leiðslu, bert tí hann er undir eftirliti frá ánarans húsum ella vinnustaði. Verður havdur í bandi, skal tað vera so mikið stutt, at leiðarin hevur hann tætt inn at sær. Gongur hundur leysur uttan leiðara, sum hevur fult ræði á honum, tekur løgreglan hann upp og og boðar tí frá, sum hundin eigur. Um tann, sum hevur hund, ikki innan 3 dagar kemur eftir hundinum við at gjalda tær útreiðslur, sum stóðust av at taka hundin upp og at lýsa eftir ánararum, syrgir løgreglan fyri, at hann verður dripin. Heldur løgreglan, at útreiðslurnar av at lýsa fara upp um virðið á tí upptikna hundinum, kann hundurin verða avlívaður uttan lýsing.

Góðkendir seyðahundar eru undantiknir reglunum.

Í kommunum uttan fyri Tórshavn kann bý- ella bygdaráðið við samtykki landsstýrisins seta fyribils reglurnar í gildi. Hesar reglur er galdandi í Argja, Vestmanna,

Tvøroyrar og Vágs kommunu.

c) Løgregluviðtøka fyri kommunurnar í Føroyum frá 3. juli 1931 § 22. Skjal 6

Eftir hesi reglu kann løgregian taka harraleysar hundar upp og lýsa teir og harumframt, um ongin er komin eftir teimum innan 3 ferðir 24 tímar við at gjalda tær útreiðslur, ið staðist hava av at taka upp og lýsa, at avlíva teir. Sama er galdandi fyri hund, sum goyr ella hvínir á almennum vegi um kvøldið ella um náttina gera grannunum ónáðir. Ánarin er undir revsiábyrgd eftir viðtøkuni.

Henda regla er galdandi í øllum kommunum uttan Tórshavnar kommunu.

d) Lóg nr. 171 frá 18. mai 1937 fyri Føroyar um hegn og markafrið § 43, sbr. §§ 41-42
Skjal 7

e) Lóg nr. 172 frá 18. mai 1937 fyri Føroyar um hagastýri og rakstur §§ 32-33
Skjal 8

Eftir § 32 kann tann, sum eigur hagarnar í bygdini í felag uttan fyri Tórshavn eftir viðtøku á grannastevnu gera av, hvussu nógvir hundar kunnu vera í bygdini og hvørjir ánararnir vera. Hundur, sum hildin verður sambært slíkari viðtøku, skal, tá onkur hagaeigari í bygdini krevur tað, beinanvegin verða hildin inni ella bundin.

Eftir § 33 eru vanligu reglurnar um revsingar- og endurgjaldsábyrgd fyri hundar og tað at skjóta teir sbr. fyriskipan nr. 88 frá 31. mars 1928, ikki galdandi fyri skaða, sum loyvdir hundar fyrstu og aðru ferð gera á seyð burtur í haga, rækt ella samgongu.

1.3. Uppskot, sum fyrr hava verið um at endurskoða reglurnar : hundar

Tann 4. februar 1972 legði landsstýrið fram uppskot til løgtingslóg um hundar fyri løgtingið (tingmál nr. 40).

Undir 1. viðgerð hin 8. februar 1972 varð málið lagt í lóganevndina.

Lóganevndin kom við áliti sínum tann 20. apríl 1972. Nevndin metti, vísandi til nakrar reglur í lógaruppskotinum, sum heimiladi landsstýrinum at áseta nærri reglur um umstøðurnar nevndar í reglunum, at uppkast til tílíkar fyrisitingarligar fyriskipanir áttu at liggið fyri, tá málið varð viðgjørt Nevndin skeyt síðani upp, at málið varð sent landsstýrinum aftur við áheitan um at leggja málið framaftur við nevnda uppkasti til fyrisitingarligar fyriskipanir.

Undir 2. viðgerð tann 21. apríl 1972 varð uppskot nevndarinnar viðtikið.

Málið sæst ikki vera viðgjørt av nýggjum í løgtinginum.

Tann 20. desember 1976 legði landsstýrið fram uppskot til løgtingslóg um hundar fyri løgtingið (tingmál nr. 20).

Lógaruppskotið var í høvuðsheitum í tráð við tað uppskotið, sum lagt varð fram í 1972. Uppkastið til fyri fyrisitingarligar fyriskipanir var hjálagt uppskotinum.

Undir 1. viðgerð tann 10. januar 1977 varð málið lagt í landbúnaðarnevndina.

Landbúnaðarnevndin kom við áliti sínum tann 29. apríl 1977. Í lógaruppskotinum stóð m.a., at hundagjaldið skuldi verða tikið av. Nevndin helt hundarnar vera ov nógvar í tali nógvastaðni, og at tað førdi mikið óskil við sær. Fyri at avmarka talið á hundum, átti eitt hægri hundagjald at verið

ásett, og heimild átti at verið fyri at sett bann móti at hava hund í kommunu ella bygd, um bygdaráðið helt tað verða neyðugt.

Sambært hesum setti nevndin fram broytingaruppskot til lógaruppskot landsstýrisins. Eftir lógaruppskotinum varð hundagjaldið ásett til 500 kr. árliga.

Undir 2. viðgerð tann 2. mai 1977 setti ein tingmaður broytingaruppskot fram til broytingaruppskot landbúnaðarnevndarinnar. Eftir hesum uppskoti verður gjaldið fyri góðkendar seyðahundar og førarahundar til blind ásett til 20 kr. árliga.

Undir 3. viðgerð tann 2. mai 1977 fall lógaruppskot landsstýrisins og broytingaruppskot landbúnaðarnevndarinnar.

Málið fall síðani burtur.

1.4. Lógaruppskot nevndarinnar

Lógaruppskot nevndarinnar er í høvuðsheitum samsvarandi teim lógaruppskotum, sum landsstýrið áður hevur lagt fram, sbr. viðmerkingarnar undir 1.3.

Galdandi reglur eru ógreiðar, ónøktandi og ótíðarhóskandi. Óhóskandi er, at somu reglur ikki eru galdandi í øllum landinum. Avgerandi reglur um merking og tíðskil samlíki hunda og harumframt lógskyldug ábyrgdartrygging fyri hundar eru bert galdandi í nøkrum fáum kommunum.

Nevndin hevur serliga hugsað um hundagjaldið.

Í viðmerkingunum til lógaruppskot landsstýrisins frá 1976, sbr. undir 1.3., verður m.a. ført fram:

"Reglurnar um spjaldur við ánarans navni og bústaði á verður skotið upp í staðin fyri galdandi reglur um tilmelding og gjald í fyriskipan nr. 88 frá 31. mars 1928 §§ 1-8, sum í

dag eru galdandi í Tórshavn, Klaksvík, Vestmanna, Sandavág og á Tvøroyri, meðan reglurnar ikki eru settar í gildi í øðrum kommunum. Við tilmeldingina verður hundurin skrásettur og ánarin fær útflýggjað hundamerki at festa á hálsband á hundinum móti at rinda eitt gjald, sum liggur millum 5 og 20 kr. Gjaldið fær kommunan, sum rindar útreiðslurnar til merkir, protokollir o.t.

Høvuðsendamálið við hundaskattinum var sambært lógarviðmerkingar at avmarka hundahaldið, men tá havt verður í huga, hvussu lítið gjaldið nú er í mun til útreiðslurnar at hava hund, kann neyvan hugsast, at gjaldið hevur nakran týdning fyri hundahaldið, og tað kann heldur ikki vera rætt at vaksa um gjaldið fyri at minka um hundatalið.

Sigast kann ikki, at kommunurnar, har skipan hevur verið galdandi, koma at missa nakra týðandi inntøkukeldu, tá samstundis verður tikið við, at kommunurnar skulu gjalda útreiðslurnar til merkir, protokollir o.t.

Tilmelding og skráseting við hundamerki hevur til endamáls at identificera hundin, men er annars ein óeffektiv skipan, tá hon bert er galdandi í nøkrum fáum kommunum.

Eftir uppskotinum verður hundaskatturin avtikin. Skrásetingin verður gjørd greiðari og betri við tað, at hetta skal henda samstundis við, at hundurin verður ábyrgdartryggjaður í seinasta lagi 4 mánaðir gamal og fær spjaldur við eigarans navni og bústaði."

Nevndin viðmerkir, at týdningurin av at merkja hundar liggur í tí, at tann, ið hund hevur, kann verða samlíknaður.

Nevndin er samd í, at hundagjaldið ikki er serliga vælegnað, tá ið útreiðslur og fyrisitingarligir trupulleikar, sum tengdir eru at eini gjaldsskipan, verða tikin við.

Nevndin hevur harumfrant ta áskoðan, at hægri gjøld enn tey galdandi neyvan fara at hava stórvegis ávirkan á hundatalið. Grund er til at halda, at fleiri og fleiri fara at lata vera við at skráseta hundin, jú hægri gjaldið verður.

Nevndin hevur umhugsað, um ein skráseting og merking kann fara fram, tá ið tann lógskylduga ábyrgdartryggingin verður teknað, soleiðis at havarin, tá ið tryggingin verður teknað, fær merki frá tryggingarfelagnum at festa í helsi á hundinum, sum kann staðfesta samlíki ánarans. Málið hevur verið havt á munni við Tryggingarsambandið Føroyar, sum tó

hevur ta áskoðan, at hundaskráseting og -merking ikki er ein tryggingaruppgáva. Nevndin er í grundini samd í hesum. Ikki er heilt rímiligt at áleggja tryggingarfelagnum at fremja eina skipan, hvørs endamál er skipanargrundað.

Nevndin skýtur tí upp, at álagt verður ánaranum undir revsiábyrgd at merkja hundin, soleiðis at ánarin kann verða samlíknaður.

Viðmerkingar til tær einstøku reglurnar

Til § 1

Reglan ásetur, at tann, ið hund hevur, hevur skyldu at ansa eftir, at hundurin, frá tí hann er 4 mánaðir gamal, hevur helsi og spjaldur, har navn og bústaður ánarans stendur á.

Reglan, sum kemur í staðin fyri tær reglur, sum galdandi eru í nøkrum fáum kommunum, um at tilmelda og merkja hundar, hevur sum endamál, at hundar í øllum landinum skulu kunnu verða samlíknaðir.

Eftir 2. stk. kann landsstýrið áseta nærri reglur um, hvussu spjaldrið skal síggja út.

Uppkast til kunngerð um hetta verður hjálagt sum skjal 9.

Til § 2

Reglan, sum ikki loyvir at hava hund á støðum, har ongin býr, samsvarar við regluna í § 9 í skipan nr. 89 frá 31. mars 1928.

Til § 3

Reglan í 1. stk. lýsir nágreiniliga reglurnar lutvíst í fyribils reglu nr. 14 frá 15. apríl 1947, sum galdandi eru í nøkrum fáum kommunum, lutvíst § 22 í politiviðtøku fyri kommunurnar frá 3. juli 1931.

Reglan er fyri tað fyrsta ein vanlig regla, sum ikki loyvir hundi at ferðast á gøtum, vegum, støðum ella økjum v.m., sum opin eru fyri vanligari ferðslu, uttan so at hann antin er havdur í bandi ella er saman við fólki, sum hevur fult ræði á honum. Hundur kann ikki sigast at hava ein leiðara, bert tí hann er undir eftirliti frá ánarans bústaði ella vinnustaði. Verður hundur havdur í bandi, skal tað vera so mikið stutt, at leiðarin hevur hann tætt inn at sær.

Afturat hesi vanligu reglu verður reglan í 5. stk. løgd, har landsstýrið eftir innseting frá býar- ella bygdaráði kann avgera, lutvíst at hundurin skal vera hildin í bandi, lutvíst at tann vanliga reglan mótvegis ferðslu og seyðahaldi verður at nýta ávísum tilskilaðum vegum ella ognum, sum ikki eru opin fyri vanligari ferðslu. Reglan í 6. stk. verður harumframt løgd afturat henni, har hundur frá sólsetri til sólarrenning, tó í minsta lagi frá kl. 21.00 til kl. 05.00, altíð skal vera í bandi, hildin inni ella bundin væl og virðiliga, og endiliga í reglu í 7. stk., har ánarin skal ansa eftir, at hann ikki reikar um.

Reglan hevur harafturat nærri reglur um at taka upp hundar, sum ganga leysir ella strúka. Um hundurin hevur helsi og spjaldur, verður ánarin fráboðaður. Hevur hundurin ikki helsi og spjaldur, verður lýst eftir ánaranum. Ánarin skal innan 3 ferðir 24 tímar heinta hundin og gjalda tær útreiðslur, ið staðist hava av at taka hundin upp. Um hundurin ikki verður heintaður innan hesa freist, kann løgreglan avhenda ella avlíva hundin.

Reglan í 2. stk. er so at siga nýggj afturímóti galdandi lóggávu, við tað at nú verður týðiliga givin heimild til, at onnur enn løgreglan kunnu taka leysar ella strúkandi hundar. Skotið verður upp, at býar- ella bygdaráð í samráð við løgregluna kann seta eitt ella fleiri fólk, sum heimild hava at taka hund upp. Viðkomandi kann vera í felag um fleiri kommunur. Ein slík skipan hevur uttan heilt greiða heimild í galdandi lóggávu virkað í Tórshavnar kommunu. Nevndin hevur ta áskoðan, at tann skipan, sum skotin er upp um at seta kommunalt sett fólk at taka hundar, er neyðug, um

verandi umstøður skulu broytast. Løgreglan hevur ikki fólk til hetta arbeiði, og tað er neyvan rímiligt, at áleggja løgregluni tílíkar uppgávur. Skipanin, sum skotin er upp, ber í sær, at kommunan sjálv fær ávirkan á umstøðurnar viðvíkjandi leysum og strúkandi hundum.

Reglan í 3. stk. er nýggj. Higartil hevur tað verið trupult at fingið inntiknar hundar til høldar. Løgreglan hevur ongin høli til inntiknar hundar. Ongin hundaalístøð alla onnur fyritøka er at taka ímóti hundum. Í ávísan avmarkaðan mun hevur djóraverndarfelagið tikið ímóti inntiknum hundum. Skotið verður upp, at kommunan ókeypis veitir løgregluni høli til inntiknar hundar. Fleiri kommunur kunnu vera felags um hølini. Kommunurnar hava harumframt skyldu til at syrgja fyri, at hundarnir verða nóg væl røktir ta tíðina.

Reglan í 4. stk. er nýggj. Hon samsvarar ásettu reglunum í 2.-3. stk., við tað at hon heimilar bý- og bygdaráðnum at áseta eitt gjald fyri útreiðslurnar av at taka hund upp og fáa hann til høldar. Reglan um at kommunan ber útreiðslurnar, um ásetta gjaldið ikki verður goldið, skal verða tikið saman við regluni í 1.-7. stk., har yvirskot av at lata øðrum hundin, kann lutast tí kommunu, sum tikið hevur hundin inn.

Reglan í 8. stk., sum ikki loyvir bítskum hundi at vera varðhund uttan loyvi frá løgregluni, er nýggj. Loyvið frá løgregluni kann m.a. seta treytir um at gyrða øki inni og við skelti at ávarða móti hundum.

Reglan í 9. stk., sum ikki loyvir at hava hund í bandi frá motorakfari, prutli ella rossaakfari ella frá hestbaki, er nýggj.

Til § 4

Reglan økir og nágreinar § 22 í politiviðtøkunum fyri kommunurnar frá 3. juli 1931. Løgreglan kann, sum skotið upp í regluni, sambært kæru áleggja tí, ið hevur hund, sum við at goyggja ella hvína og ikki gevst ger grannunum ónáðir, at hava hundin

innilæstan. Um tað ikki batti, ella hundurin longu var innilæstur, kann løgreglan áleggja ánaranum at beina fyri hundinum.

Til § 5

Reglan, sum ikki loyvir, at hundur støðugt verður hildin bundin og nærri reglur, sum hava fyrilit fyri hundinum, tá hann er bundin, eru nýggjar.

Til § 6

Eftir § 11, 1. stk., í fyriskipan nr. 88 frá 31. mars 1928 ber tann, sum hevur leysan hund, ábyrgdina, at hann ikki bítur sakleys fólk, skræðir klæði teirra sundur ella á annan hátt elvir til skaða. Tann, ið hund hevur, verður sektaður, og hevur skyldu til at endurgjalda skaðan og at veita samsýning fyri svið og pínu, lýti og vansar.

Eftir 1. stk. í regluni, sum skotin er upp, kemur í staðin fyri § 11, 1. stk. í fyriskipanini ein regla um, at álagt er tí, sum hevur hund, at ansa eftir, at tað, sum eftir umstøðunum krevst fyri at forða fyri, at hundurin ger skaða, verður gjørt. Brot á hesa reglu kann verða sektað eftir § 12 í lógaruppskotinum, um ánarin tilætlað ella óviljað er sekur. Sambært § 11, 1. stk., í galdandi fyriskipan, har ábyrgdin bert er galdandi fyri hundar, sum ganga leysir, er ábyrgdin sambært lógaruppskotinum galdandi fyri allar hundar. Reglurnar um endurgjald standa í § 8 í lógaruppskotinum.

Reglan í 3. stk. um at álagt verður tí, ið hevur hund, at avlíva hundin, um hann ikki verður hildin inni ella fær kjaftband, svarar til regluna í § 11, 1. stk., í galdandi fyriskipan. Tílík treyt kann verða áløgd í teimum førum, har hundurin hevur gjørt skaða, sum táverandi ánarin hevur fingið bót fyri - ella endurgjaldsábyrgd sambært dómi, samtykt ella sátt í førum, har hundurin er bítskur ella glúpskur ella hevur sum vana á gøtu, vegi, breyt ella øki v.m., sum opin eru fyri vanligari ferðslu, at gera fólki ónáðir við at leypa uppá tey ella elta tey, og

harumframt í teim førum, har hundurin ger húsdjórum á ogn ella á bøi ónáðir. Fyri at tryggja, at tað ið álagt er, verður hildið, um hundurin verður fluttur í aðra kommunu, bygd ella bý, er ein regla sett aftrat um, at ánarin, tá hann flytir, hevur skyldu til at boða næsta løgreglumyndugleika frá treytini.

3. stk. um at skjóta hund, sum leypur á og skaðar húsdjór og serliga seyð og lomb á ogn, á bøi ella í haga, samsvarar § 11, 2. stk., í galdandi fyriskipan.

Til § 7

Reglan, sum ásetur, at handil við hundum, vinnulig passing og aling krevur løgregluløyvi, er nýggj. Løyvi løgreglunnar kann m.a. verða givið undir treytum landsdjóralæknans viðvíkjandi tilhaldi og neyðugari passing hundanna og undir teim treytum, at góðkendur djóralækni er knýttur at fyritokuni fyri hennara rokning. Henda regla kann undir verandi umstøðum ikki nýtast í verki.

Til § 8

Í reglini í 1. stk. standa endurgjaldsreglurnar. Tann, ið hevur hund, hevur skyldu til at endurgjalda tann skaða, hundurin elvir til. Endurgjaldið kann tó verða lækkað ella dett heilt burtur, um tann, ið fingið hevur skaða, sjálvur gjørdi nakað til. Reglan samsvarar partinum í § 11, 1. stk. í galdandi fyriskipan um endurgjaldsrætt.

Í 2. stk. verður ásett, at tann, ið hevur hund, hevur skyldu at hava hann ábyrgdartryggjaðan. Reglan kemur í staðin fyri reglur um lógskylduga ábyrgdartrygging fyri hundar, sum galdandi eru í einstøkum kommunum, og er sostatt galdandi fyri allar hundar.

Eftir 3. stk. ásetir landsstýrið í samráð við tryggingarfelagið gjøllari reglur um at seta tryggingarreglurnar í 2. stk. í verk.

Uppkast til kunngerð um ábyrgdartrygging fyri hundar verður

hjálagt sum skjal 10.

Eftir § 1 í hesum uppkasti fevnir tryggingarskyldan um allar hundar, undantiknir teir hundar, sum landsmyndugleikar, landsstovnar, ríkismyndugleikar og ríkisstovnar hava. Tryggingarfelagið tryggjar undir hundaábyrgdartryggingini eisini ábyrgdina fyri hvølpar, sum ikki eru 4 mánaðir gamlir, so leingi teir eru hjá nammuni.

Tryggingin skal fevna um fólkaskaða fyri upptil 5.000.000 kr. og lutaskaða fyri upptil 2.000.000 kr. fyri tann skaða, sum hendur er einaferð.

Tryggingarsambandið Føroyar hevur í samráðingunum við nevndin skotið upp, at tryggingin fevnir um skaða fyri upptil 1.000.000 kr., sum er tann vanliga upphæddin í skaðatryggingarviðurskiftum. Nevndin heldur tó, at tær upphæddir, sum skotnar eru upp í uppkastinum, eiga at vera galdandi, og vísir m.a. til tær álvarsligu ferðsluvanlukkur, leysur hundur kann elva til.

Í uppkastinum standa harafturat nærri reglur um ta lógskyldugu ábyrgdartryggingina.

Eftir § 4 hevur tryggingarfelagið skyldu til at endurgjalda skaðar, sum hildið verður ókendur hundur hevur elvt til, og til - við aftursókn møtvegis tí ábyrga - at rinda endurgjaldið í tí føri, har ótryggjaður hundur ella hundur, sum er tryggjaður, men hvørs trygging er farin úr gildi ella ikki hildin, hevur gjørt skaða. Endurgjald umframt upphæddirnar í § 1 verður ikki veitt.

Til §§ 9-11

Í hesum reglum standa rættargangsreglurnar fyri mál um endurgjald fyri skaðar, sum hundur hevur gjørt.

Til § 12

Í regluni standa revsireglurnar í lógaruppskotinum. Sektin er

fyri brot á nærri tilskilaðar reglur, fyri at skúgva tað, sum álagt er sambært lógini ella eina treyt fyri einum loyvi til viks.

Tann, sum beitir hund eftir onkrum, ella ikki heldur hundi aftur, tá ið hann sær, at hann leggur eftir onkrum, verður sektaður. Henda regla samsvarar § 12 í galdandi fyriskipan.

Harumframt kann sekt verða ásett í forskriftunum, sum gjørdar eru sambært lógini.

Til § 13

Reglan, sum ásetur, at tær vanligu reglurnar um sekt og endurgjald um rætt til at avlíva hund, ikki er galdandi fyri tann skaða, sum ein seyðahundur í felagshaga elvir seyði fyrstu og aðru ferð burturi í haga, samsvarar § 11, 3. stk., í galdandi fyriskipan og § 33 í lóg nr. 172 frá 18. mai 1934 fyri Føroyar um stýri og rakstur av høgum.

Til § 14

Í 1. stk. stendur, nær lógin kemur í gildi. Eftir uppskotinum kemur lógin í gildi tann 1. apríl 1990. Tí, ið hevur hund, eigur at vera givin ein hóskandi tíðarfreist til at lúka tá treyt, sum áløgd er í § 1 í uppskotinum, um at geva hundi spjaldur.

2. stk. setur úr gildi allar tær galdandi reglurnar um hund, sum standa undir 1.2. í teim vanligu viðmerkingunum til uppskotið. Tó verða reglurnar í lóg nr. 171 frá 18. mai 1937 fyri Føroyar um hegn og friðaðan bø § 43, sbr. §§ 41-42, um at ganga ígjøgnum fremmanda haga við hundi.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/ Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 107 /1989: Løgtingslóg um hundar.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 24. apríl 1990 og eftir 1. viðgerð 26. apríl 1990 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskotið. Sambært § 14 í fyriliggjandi lógaruppskoti skal lógin koma í gildi 1. apríl 1990. Sum tilskilað omanfyri, er málið ikki framlagt fyrr enn 24. apríl 1990.

Ein samd rættarnevnd vísir til viðmerkingarnar frá landsstýrinum viðvíkjandi § 14, har sagt verður, at tí, ið hevur hund, eigur at verða givin ein hóskandi tíðarfreist til at lúka ta treyt, sum álagd er í § 1 í uppskotinum, um at geva hundi spjaldur, og er nevndin av teirri áskoðan, at lógin skal fáa gildi frá 1. juli 1990, og verður tí sett fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 14 verður soljóðandi:	§ 14 formuleres således:
"Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1990."	"Denne lov træder i kraft 1. juli 1990".

RÆTTARNEVNDIN, 22. mai. 1990.

Jógvan Durhuus Marita Petersen John Petersen

Tordur Niclasen Eilif Samuelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 24. apríl 1990

TIf. 11080 . Telex 81310 lingma fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Afgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

F. L. j. nr. 1713-13-1

AMF/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 108/1989: Broyting í løgtingslóg um vernd av dýrum.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vernd av dýrum.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om værn af dyr.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 9 frá 14. mars 1985 um vernd av dýrum verða í § 9 gjordar hesar broytingar:	I lagtingslov nr. 9 af 14. marts 1985 om værn af dyr foretages i § 9 følgende ændringer:
1) Stk. 2 fellur burtur.	1) Stk. 2 udgår.
2) Stk. 3 verður stk. 2, og stk. 4 verður stk. 3.	2) Stk. 3 bliver stk. 2 og stk. 4 bliver stk. 3.
§ 2.	§ 2.
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hun er kunngjørd.	Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Broytingaruppskotið er gjørt soleiðis, at tað aftur er loyvt at

gelda djór, t.v.s. orðingin í lógini er tann sama sum uppruna-uppskotið í djóraverndarlógini, tó eru stk. 2-3 í § 9 ikki avtikin.

Ein bólkur, settur av landsstýrinum at gera reglugerð fyri hundar og kettur er samdur um, at hetta er neyðugt fyri at fáa skil á tí hunda- og kettuóskili, sum ræður.

Landsstýrið leggur sostatt fyri løgtingið frammanfyri standandi uppskot til broyting í løgtingslóg um vernd av dýrum.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/

Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 108/1989: Broyting í løgtingslóg um vernd av dýrum.

Málið er framlagt av Føroya landsstýri tann 24. apríl 1990 og eftir 1. viðgerð 26. apríl 1990 beint í umhvørvisnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at samtykkja uppskot landsstýrisins.

UMHVØRVISNEVNDIN, 27. apríl 1990

Eliesar Arge Edmund Joensen Marita Petersen

Finnbogi Ísakson Lasse Klein

JAVNAÐARFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 109/89: Friðing av øki A á Føroya Banka.

U p p s k o t

til

samtyktar

I. Álagt verður landsstýrinum at friða øki A á Føroya Banka fyri allar veiðu frá 1. juni og eitt ár fram.

II. Heimilað verður landsstýrinum saman við fiskivinnunevndini í hesum tíðarskeiði at gera einstakar royndir við línu og snellu fyri at kanna gongdina.

III. Álagt verður landsstýrinum eftir 1. juni 1991 bert at loyva veiðu við línu og snellu á hesum øki.

Viðmerkingar:

Vanliga verður øki A á Føroya Banka friðað fyri troling ávísar tíðir av árinum, men royndir hava víst, at henda friðing ikki sýnist at muna nógv, tí veiðan er alsamt minkandi og fiskurin smærri. Heldur hendan gongdin fram, kann væntast, at Føroya Banki verður oyðilagdur sum fiskimið.

Tí verður skotið upp at friða øki A á Føroya Banka fyri allari veiðu frá 1. juni 1990 og eitt ár fram.

Hetta økið er á leið innanfyri 200 m (100 fv.) dýptar-

kurvina.

Eftir 31. mai 1991 kundi fiskirannsóknarstovan gjørn royndir við línu og snellu á hesum øki. Hesar royndir kundu eisini farið fram í minni mun í tí friðaða tíðarskeiðinum fyri at fylgt gongdini.

Tað hava verið tíðir, tá nærum eingin trolveiða er farin fram á Føroya Banka, eitt nú undir seinasta heimsbardaga.

Í teimum tíðum vignaðist væl bæði fyri snøris- og línuveiðu.

Um støddina av hesum øki kann nevnast, at øki Á á bankanum er umleið sama stødd sum alt Norðhavið frá einari línju í norðan úr Mykinesi til eina linju í ein norðan úr Bispinum út á 200 m (100 fv.) dýpi, so her er talan um eitt stórt og gott fiskiøki.

Tað er trupult at fáa neyv tøl fyri samlaðari veiðu á Føroya Banka, tí veiðutølini eru samanlogd við veiðutøl á øki ICES Vo 2 (sum eisini umfatar stórt øki á djúpum vatni vestanfyri).

Hesi tøl vísa eina veiðu frá 9000 til sløk 12000 tons pr. ár tey 8 seinastu árini. Tað er mest upsi, kongafiskur og blálonga, sum eru íroknað hesi tøl, og sostatt mest veidd á djúpum vatni.

Nevnast kann, at hetta eisini kom fram á fundi 8. februar 1989 millum samtakið Línuskip og landsstýrið, har teir eisini ráða tiol, at Føroya Banki verður friðaður innanfyri núverandi linju alt árið fyri allari trolveiðu tey komandi árini.

Út frá hesum viðmerkingum verður sett hetta uppskotið til samtyktar.

Á FØROYA ØGTINGI, 5. apríl 1990.

Henrik Old

Á l í t

í

løgtingsmáli nr. 109/1989: Friðing av øki A á Føroya Banka.

Málið er framlagt av javnaðarflokkinum tann 5. apríl 1990 og eftir 1. viðgerð 19. apríl beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Guni Jacobsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Durhuus og Petur Reinert) vísir á, at sambært § 4, stk. 1 í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 við seinni broytingum, hevur fiskivinnunevnd løgtingsins saman við landsstýrinum heimild at áseta reglur um, hvussu fiskiskapur skal fremjast á landleiðini, m. a. friðað øki og friðingartíðir. Løgtingsins fiskivinnunevnd hevur sosatt, saman við landsstýrinum, heimild til at fremja tey friðingartiltøk sum uppskotsstillarin mælir til.

Fiskivinnunevndin samtykti tann 4. mai 1990 at totalfriða øki A á Føroya Banka frá 1. juni 1990 og eitt ár fram fyri allari veiðu. Málið er sent landsstýrinum til støðutakan. Meirilutin tekur tí ikki undir við uppskotinum soleiðis sum tað var orðað og setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Henrik Old) førir fram at undir viðgerðini í fiskivinnunevndini um friðing av øki A á Føroya Banka, vórðu umboð fyri vinnuna innkallað í nevndina.

Umboðið fyri felagið "Trolskip" segði, at teir einki høvdu ímóti, at friðingartiltøk vórðu gjørd á Føroya Banka, men tá byrjað varð aftur við royndarveiði tá átti trolararnir eisini at sleppa við á jøvnum føti við línu- og snelluskip.

Umboðið fyri Skipara- og Navigatørfelagið vísti á, hvussu álvarslig støðan var bæði fyri toska- og hýsustovnin á Føroya Banka, serliga at tann nógvi smáfiskur, sum fyrr var at fáa, einki sæst til nú. Hann lagði afturat, at fiskur vaks

skjótt á Føroya Banka, og at sunnara markið átti at verið flutt longur suður.

Eisini fekk nevndin bræv frá Meginfelag Útróðrarmanna, har teir taka undir við uppskotinum og at gott eftirlit eigur at verða við triðingini.

Minnilutin skjýtur upp at broyta uppskotið í tingmáli nr. 109/1989 friðing av øki A á Føroya Banka, so tað er í samljóð við tað, ið meirilutin í fiskivinnunevndini samtykti á fundi tann 4. mai 1990 við 6 atkvøðum, at friða øki A á Føroya Banka frá 1. juni 1990 og eitt ár fram fyri alla veiði. Í staðin fyri tá áður framsetta uppskotið til samtyktar verður sett fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at friða øki A á Føroya Banka frá 1. juni 1990 og eitt ár fram fyri allari veiði.

Ein annar minniluti (Tórbjørn Poulsen) hevur hesar viðmerkingar til uppskot til samtyktar frá Henrik Old, løgtingsmanni, um friðing av Føroya Banka.

Eingin tvi kann vera um, at Føroya Banki er sera illa fyri. Hvørvitt tað er av ovurfisking ella av náttúrgivnum orsøkum er ógreitt; men sannroynd er, at veiðan er alsamt minkandi og fiskurin smáfallandi.

At tiltøk eiga at verða sett í verk, til tess at fáa stovnin upp aftur, eru allir partar samdir um.

Men ein heildarfriðing av Føroya Banka vil føra við sær, at trýstið á aðrar leiðir verður so nikið størri, við vanda fyri somu álvarsligu avleiðingum, sum nú eru eyðsýnligar á Føroya Banka.

Heldur enn at totalfriða eitt ávist øki fyri allari veiðu alt árið, eiga vit at taka fiskivinnumynstrið á føroyaleiðini upp til nýggja meting, við atliti til tey ymsu veiði-

amboðini.

Minnilutin er samdur við meirilutan í, at fiskivinnunevnd løgtingsins saman við landsstýrinum, sambært § 4, stk. 1 í løgtingslóg nr. 8 frá mars 1978 við seinni broytingum, hevur heimild at seta tey friðingartiltøk í verk, sum uppskotsstillarin mælir til, og setur tískil einki uppskot fram.

FISKIVINNUNEVNDIN, 25. mai 1990.

Svend Auge Ellefsen | Suni Jacobsen | Jákup Lamhauge

Jógvan Durhuus | Petur Reinert | Henrik Old

Tórbjørn Poulsen

JAVNAÐARFLOKKURIN

Tórshavn, 24. apríl 1990

Føroya Løgting!

Løgtingsmál nr.110/1989: Lóg um húsalánstrygging.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta nevnd av sakkønum at gera uppskot til lóg um trygging av lánum í sethúsa- og íbúðum og at leggja hetta uppskot fyri tingið í komandi tingsetu.

Viðmerkingar:

Í landsstýrisskeiðnum 1985-89 hendi nógv á íbúðarøkinum. Lógin um rentustudning til samansparing til sethús- og íbúðarbygging varð broytt. Somuleiðis vórðu broytingar gjørdar í lóg ini um húsalánsgrunnin. Eisini fingu vit nýggja lóg um íbúða - grunn.

Urdanfarna landsstýri arbeiddi eisini við øðrum málum á hesum øki. Eitt var nýggj leigulóg og eitt annað var lóg um trygging av lánum til sethúsa- og íbúðarbygging. Til tess at arbeiða við tí málinum varð ein fyribils nevnd sett við trimum limum. Ætlanin var at seta eina nakað større nevnd seinni.

Sum kunnugt slapp landsstýrið, ið sat frá 1985 til 89, ikki at halda fram. Orslitið av løgtingsvalinum í 1985 førdi aði fyri tí. Javnaðarflokkurin, sum umsat íbúðarmál meðan nevnda landsstýri sat, kom í andstøðu. Okkum kunnugt er ikki meira gjørt við spurningin um eina húsalánstrygging.

Javnaðarflokkurin loyvir sær tí at reisa málið í løgtinginum. Hetta gera vit við einum uppskoti til samtyktar, har løgtingið áleggur landsstýrinum at seta nevnd av sakkonum at arbeiða við hesum máli, og har landsstýrið fær álagt at leggja málið aftur fyri tingið í komandi tingsetu.

Fyribilsnevndin, sum varð sett at gera eitt ávist kanningararbeiði, hevði eitt umboð frá tryggingarsambandinum og eitt umboð frá húsalánsgrunninum, umframt landsstýrisfulltrúan í íbúðarmálum. Javnaðarflokkurin hugsar sær at ein nýggj nevnd verður nakað størri. Hon kundi t. d. verið samansett av fimm umboðum. Umframt eitt umboð frá landsstýrinum, kundi tryggingarsambandið fingið eitt umboð, húsalánsgrunnurin eitt, sparikassarnir eitt og bankarnir eitt umboð.

Javnaðarflokkurin er vitandi um, at ein húsalánstryggingarskipan er galdandi í Noreg, og vórðu ávísir upplýsingar um hesa skipan fingnir til vega í 1988. Har er talan um fleiri møguleikar. Í tí eina møguleikanum liggur tað, at restskuldin verður goldin, um so er at lántakarin doyr. Í hesum førinum er tryggingargjaldið 0,33% av tí verandi skuldini.

Ein annar møguleiki er, at hjúnarfelagar hvør sær, tryggja hvør sín helming av skuldini. Fellur annar hjúnarfelagin frá verður helmingurin av láninum goldin av húsalánstryggingini. Í ernum triða møguleika verður skipanin víðkað, soleiðis at hjúnarfelagar hvør sær, kunnu tryggja seg fyri alt lánið. Fellur annar hjúnarfelagin frá verður alt lánið goldið. Slík dupultrygging kostar 0,56% av tí til eina og hvørja tíð verandi lánsupphædd.

Umframt teir her nevndu møguleikarnar, finst eisini eir fjórði møguleiki í norsku skipanini, men kostar hesin vel meira. Hesin kostar eitt eykagjald uppá 0,33% av lánsupphæddini. Verður hendan valdi afturat einum av hinum møguleikunum, ber tað við sær, at alt lánið verður goldið, um so er, at lántakarans arbeiðsevni, orsakað av sjúku ella vanlukku, verða varandi skerd við minst 50%. Hendan kann tó ikki teknast av fólki sum eru 60 ár og eldri.

Sum tað skilst av tí, sum her er nevnt, so er norska skipanin ikki tvungin. Her er talan um eina sjálvboðna tryggingarskipan har tað ber til at velja ímillum fleiri ymisk sløg av trygging. Tryggingargjaldið verður kravt inn saman við rentum og

avdráttum av teim tryggjaðu lánunum.

Tá fólk seta búgv - byggja ella keypa setnús ella íbúð, eru framtíðarvónirnar ofta sera bjartar. Tey eru í góðum árun og hava góða heilsu. Hava arbeiði og inntøkumøguleikarnir tykjast góðir. Bráddliga kunnu inntøkumøguleikarnir kortini verða skerdir. Av sjúku, vanlukkutilburði ella deyða kunnu inntøkumøguleikarnir verða skerdir ella hvørva heilt. Tá hetta hendir einum hjúnarfelaga, sitir hin eftir við tí skuld, sum varð alstað tveimum at bera.

Út frá hesum heldur javnaðarflokkurin at landsstýrið eigur at seta eina revsd at arbeiða við málinum. Javnaðarflokkurin hugsar sær, at tryggingargjaldini fara inn í ein grunn, og at hesin verður umsitin av annaðhvort tryggingarsamtakinum ella húsalánsgrunninum.

Vilhelm Johannesen
Jørgen Thomsen

Márita Petersen
Hendrik Old
Atli P. Dam

Jakup Lindenskov
Jógvan A. Johannesen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 110/1989: Lóg um húsalánstrygging.

Málið er framlagt av Javnaðarflokkinum tann 26. apríl 1990 og eftir 1. viðgerð tann 2. mai beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Umboðini fyri landsstýrisflokkarnar í nevndini eru vitandi um, at landsstýrið arbeiðir við málinum, men kunnu taka undir við uppskotinum frá Javnaðarflokkinum, um orðingin í uppskotinum til samtyktar verður broytt.

Í staðin fyri uppskot Javnaðarfloksins setir ein samd almanna- og heilsunevnd fram soljóðandi:

U p p s k o t

til

samtyktar.

Løgtingið áleggur landsstýrinum at kanna málið um trygging av lánum í sethúsum og íbúðum og at leggja kanningina fyri tingið í komandi tingsetu.

ALMANNA- OG HEILSUNEVNDIN, 25. mai 1990.

Petur Reinert — Jógvan á Lakjuni — Suni Jacobsen

Jákup Lindenskov — Niels Pauli Danielsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TF. 11080 . Telex 81310 tlogms fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

2. mai 1990

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 414-12-2

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 111/1989: Broyting í løgtingslóg um føroyskan happadrátt.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um føroyskan happadrátt.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om et færøsk klasselotteri.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 49 frá 15. juni 1950 um føroyskan happadrátt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, litra a verður orðingin "Talið á lutunum má ikki fara upp um 18000 í hvørjum flokki, men talið á umskiftislutunum má ikki fara upp um 1000 í hvørjum flokki." broytt til: "Landsstýrið fær heimild til at áseta talið á lutum og talið á um-

§ 1.

I lagtingslov nr. 49 af 15. juni 1950 om et færøsk klasselotteri med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I §, litra a ændres "Antallet af lodder må ikke overstige 18000 for hver serie. Antallet af erstatningslodder må ikke overstige 1000 for hver serie." til: "Landsstyret får hjemmel til at fastsætte antallet af lodder og erstatningslodder."

skiftisseðlum."

2) Í § 1, litra b verður orðingin "Innskotið í hvønn einkuita flokkin skal vera 160 kr. fyri heilan lut." broytt til: "Landsstýrið fær heimild til at áseta prísin á lutunum.".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er galdandi fyri happadráttarseðlar til dráttir aftaná 1. januar 1991.

2) I § 1, litra b ændres "Indskuddet til den enkelte serie for et helt lod skal være 160 kr." til: "Landsstyret får hjemmel til at fastsætte loddernes pris.".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort og finder anvendelse på lotterisedler til trækninger efter den 1. januar 1991.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur fingið skriv frá happadráttinum við áheitan frá happadráttarnevndini um, at leggja fyri løgtingið uppskot um lógarbroyting soleiðis, at landsstýrið fær heimild til at broyta talið á lutunum, talið á umskiftislutunum og prísin á lutunum.

Um lógarbroytingin verður framd, verður lættari at gera broytingar, ið nøkta eftirspurningin. Nevndin hevur longu skotið upp, at prísurin fyri hvønn heila lutin verður settur til 200 kr. í staðin fyri sum nú 160 kr., og at lægsti vinningur verður hækkaður til 500 kr., t.v.s. at allir vinningar uppá 200 kr. verða strikaðir.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja nevndu broytingar.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 111/1989: Broyting í løgtingslóg um føroyskan happadrátt.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 2. mai 1990 og eftir 1. viðgerð 4. mai boint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskotið.

FÍGGJARNEVNDIN, 7. mai 1990.

Anfinn Kallsberg Flemming Mikkelsen Jógvan Durhuus

Eilif Samuelsen Heine O. Heinesen Tordur Niclasen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080 . Telex 81310 lavms fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

EJ/or

2. mai 1990

F. L. j. nr. 514-11-3
(at tilskila í svari)

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 112/1989: Broyting í løgtingslóg um hýruvognskoyring.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um hýruvognskoyring.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om byrekørsel.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 104 frá 19. oktober 1982 um hýruvognskoyring verður gjørd henda broyting:	I lagtingslov nr. 104 af 19. oktober 1982 om byrekørsel foretages følgende ændring:
§ 5, stk. 3 verður strikað.	§ 5, stk. 3 udgår.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg um hýruvognskoyring nr. 104 frá 19. oktober 1982 varð givin landsstýrinum heimild at gera eina standard hýruvognsreglugerð, sum eftir ynski frá einari ella fleiri kommunum kundi setast í gildi har.

Henda reglugerð er nú gjørd, og bleiv tann 20. oktober 1987 sett í gildi fyri Tórshavnar kommunu við broytingum.

Eftir § 1 og § 2, stk. 1 í reglugerðini skal bygda(r)-/býráðið (í Tórshavn hýruvognsnevndin) geva loyvi til teir persónar, ið ynskja at reka vinnuligan fólkaflutning við motorakfari góðkent og innrættað til flutning av í mesta lagi 9 persónum, førarin íroknaður.

Eftir § 2, stk. 3 í reglugerðini skal bygda(r)-/býráðið (í Tórshavn hýruvognsnevndin) áseta talið av hýruvognsloyvum í kommununi eftir

1. talinum av longu fyriliggjandi vinnuloyvum og nýtsluni av hesum,
2. tørvinum á einari rímiligari tænastu hjá íbúgvarunum í kommununi,
3. møguleikunum fyri rímiligari inntøku hjá teimum vinnurekandi.

Uppgávan hjá bygda(r)-/býráðnum (í Tórshavn hýruvognsnevndini) má sigast at vera at regulera talið av hýruvognum í kommununum til frama fyri bæði teir vinnurekandi og brúkaran.

Fyri at kunna rokja hesa uppgávu til fullnar er neyðugt, at bygda(r)-/býráðið (í Tórshavn hýruvognsnevndin) hevur heimild til at áseta samlaða talið av hýruvognum í kommununi.

Hetta er ikki møguligt eftir tí fyriliggjandi lóggávuni. Í § 5, stk. 3 í løgtingslógini um hýruvognskoyring er nevnliga ásett at: "Vinnubrøv, sum nýtt eru til hýruvognskoyring áðrenn ein hýruvognsreglugerð verður sett í gildi í einari kommunu, verða framvegis í gildi.

Hjá teimum, ið ikki hava havt hýruvognskoyring sum høvuðsvinnu, er vinnubrævið tó bert galdandi til hýruvognurin verður útskiftur."

Eftir hesi grein, ið endurtikin er í kunngerðini um hýruvognsa-

koyring sum § 16, stk. 3, er møguligt hjá øllum, tó hava vinnubrøv til aksturvinnu frá áðrenn reglugerðin varð sett í gildi, ótarnað at halda fram at koyra hýruvogn uttan hýruvognsloyvi frá bygda(r)-/býráðnum (í Tórshavn hýruvognsnevndini).

Møguleiki er eisini hjá persónum, tó hava vinnubrøv til aksturvinnu í aðrari kommunu frá áðrenn reglugerðin um hýruvognskoyring varð sett í gildi, at fáa átekning á vinnubrøv sítt um eisini at umfata aðrar kommunur. Soleiðis kunnu hesir eisini koyra hýruvogn í aðrari kommunu uttan hýruvognsloyvi frá hesari.

Neyðugt er at fáa hesi viðurskifti broytt soleiðis, at ein og hvør, tó skal røkja hýruvognskoyring í kommunu, har hýruvognsreglugerðin er sett í gildi, skal hava hýruvognsloyvi frá avvarðandi kommunu.

Neyðugar broytingar verða gjørdar í hesum lógaruppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 108 frá 19. oktober 1982 um hýruvognskoyrint við at strika § 5, stk. 2.

Eftir núverandi lóggávu er sera trupult hjá løgregluni at kanna, um ein hýruvognur hevur tey neyðugu loyvini. Hevur ein hýruvognsførari vinnubrøv frá áðrenn reglugerðin varð sett í gildi og einki hýruvognsloyvi, má kannast, um akfarið er útskift eftir at reglugerðin er sett í gildi ella ikki. Er akfarið útskift, má støða takast til, um hýruvognskoyringin er høvuðsvinna ella ikki hjá viðkomandi hýruvognsførara, og sum verða man er sera trupult at taka støðu til hetta.

Verður lógarbroytingin framd, sum skotið er upp, verður einans neyðugt hjá løgregluni at kanna eftir, um viðkomandi hýruvognur hevur vinnubrøv og hýruvognsloyvi. Eftir reglugerðini skulu prógv fyri vinnubrøvi og hýruvognsloyvi sjónliga vera í akfarinum, so støða kann takast á staðnum til, um hýruvognurin hevur neyðugu loyvini.

Fyrí at fáa samljóð millum hesa lóg og kunngerðina, verður eisini neyðugt at broyta orðaljóðin í § 2, stk. 3, nr. 1 í kunngerðini,

so vinnuloyvi verður broytt til hýruvognsloyvi og hørumframt at strika § 16, stk. 2.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/ Eyðfinnur Jacobsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 112/1989: Broyting í løgtingslóg um hýruvognskoyring.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 2. mai 1990 og eftir 1. viðgerð tann 4. mai beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir á kunngerð nr. 61 frá 3. juni 1989 um endurrinding av serligum innflutningsgjaldi og skrásetingargjald á hýru- og/ella skúlavognum, har sambært § 3, stk. 3 endurgjald av skrásetingargjaldinum verður bert góðtikið um bruttoinnkoyringin í einum ári er í minsta lagi:

Í Tórshavn	150.000,00 kr.
Í býum/bygdum yvir 1000 íbúgvarum	125.000,00 kr.
Á øðrum plássum	100.000,00 kr.

Omanfyri nevndu upphæddir verða at endurskoða á hvørjum ári.

Rættarnevndin roknar sostatt við at umsitingin fylgir seinastu nevndu reglu soleiðis, at møguleikar eru fyri at tillaða treytirnar eftir møguligum broyttum viðurskiftum.

Ein meiriluti (Jógvan Durhuus, Marita Petersen, John Petersen og Eilif Samuelsen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Tordur Niclasen) tekur støðu í tingsalínum.

RÆTTARNEVNDIN, 22. mai 1990.

Jógvan Durhuus Marita Petersen John Petersen

Tordur Niclasen Eilif Samuelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11040 . Telex 81110 tinghs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

2. mai 1990

F. L. j. nr. (at tilskila í svari) 2235-1-1

IC/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 113/1989: Broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis).

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis).

lagtingslov om ændring i lagtingslov om Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis).

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 65 frá 21. mai 1987 um Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis) verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í heitinum á løgtingslógini verður "Academia" broytt til "Universitas".
2) Óbroytt.
3) Óbroytt.
4) Óbroytt.
5) Óbroytt.
6) Óbroytt.
7) Óbroytt.
8) Óbroytt.
9) § 15, stk. 3 verður orðað

§ 1.

I lagtingslov nr. 65 af 21. maj 1987 om Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis) foretages følgende ændringer:

1) I lagtingslovens titel ændres "Academia" til "Universitas".
2) I § 1, stk. 1 ændres "akademi" til "universitet".
3) I § 1, stk. 2, § 3, § 5, § 6, stk. 1, første og andet punktum, § 11, stk. 4, § 12, stk. 1, § 13, stk. 1, § 15, stk. 1 og stk. 6 og § 18 ændres "akademiet" til "universitetet".

soleiðis:

"Rektari Fróðskaparsetursins og setursskrivarin eru fastir nevndarlimir."

10) § 16 verður orðað soleiðis:

"Settar kunnu verða samskiftisnevndir millum stovnar, felagsskapir, almenna yvirvøld og Fróðskaparsetrið til kunningar um viðurskifti av sínamillum áhuga."

4) I § 2, § 4, § 10, § 11, stk. 1, § 12, stk. 2 og stk. 3 (2 gange) og § 15, stk. 7 ændres "akademiets" til "universitetets".

5) I § 5 og i overskriften til kapitel VII ændres "akademiråd" til "universitetsråd".

6) I § 9 ændres "akademisekretær" til "universitetssekretær".

7) I § 10, § 11, stk. 1, stk. 2, første og andet punktum og stk. 4, § 12, stk. 1 - 7, § 14, stk. 6 og 7 og § 18 ændres "akademirådet" til "universitetsrådet".

8) § 11, stk. 3 affattes således:

"Til universitetsrådet vælges desuden for 3 år ad gangen en repræsentant for det teknisk-administrative personale. For 1 år ad gangen vælges af og blandt studenterrepræsentanterne i fakultetsrådene 2 repræsentanter til universitetsrådet."

9) § 15, stk. 3 affattes således:

"Rektor for universitetet og universitetssekretæren er faste medlemmer af nævnet."

10) § 16 affattes således:

"Der kan nedsættes kontakt-

udvalg mellem institutioner, organisationer, offentlige myndigheder og universitetet til orientering om forhold af gensidig interesse."

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 47/1986: Løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (Academia Færoensis) samtykti løgtingið 13. apríl 1987 umroddu løgtingslóg við 27-0 atkvøðum, og hon varð sett í gildi sum løgtingslóg nr. 55 frá 21. mai 1987.

Í umroddu løgtingslóg, kap. V um samstarvsnevndina, sum skal vera liður millum landsstýrið og Fróðskaparsetrið, er § 15, stk. 3 orðað soleiðis:
"Rektari Fróðskaparsetursins, setursskrivarin og tann landsstýrismaður, ið setrið hoyrir undir, eru fastir nevndarlimir."

§ 15, stk. 4 ásetir, at landsstýrið herumframt tilnevnir ein lim í samstarvsnevndina at umboða landsfyrisitingina.

Nú henda løgtingslóg hevur verið í gildi í 3 ár, hava royndirnar vist, at ongin orsøk er til, at tann landsstýrismaður, ið setrið hoyrir undir, sjálvur er fastur limur í samstarvsnevndini.

Royndirnar vísa eisini, at nóg mikið er, at rektari Fróðskaparsetursins, setursskrivarin og tann limur, sum landsstýrið tilnevnir at umboða landsfyrisitingina, manna samstarvsnevndina, tá nevnda umboð fyri landsfyrisitingina kann kunna tann lands-

stýrismann, sum setrið heyrir undir, um øll viðurskifti og alt tilfar, sum samstarvsnevndin viðger, heruppií sambært § 15, stk. 6, heildarfiggjanaruppskotið fyri Fróðskaparsetrið, sum verður lagt fyri samstarvsnevndina til kunningar, áðrenn tað verður sent landsstýrinum, og sambært § 15, stk. 7 frágreiðingina um starvssemi Fróðskaparsetursins, m.a. nýggjar útbúgvingarætlanir, sum verður givin í samstarvsnevndini í minsta lagi eina ferð um árið.

Herumframt hevur Fróðskaparsetrið mælt til, at "Academia Færoensis" í heitinum á løgtingslógini verður broytt til "Universitas Færoensis" við teirri grundgeving, at tað tá, serliga í samskifti við onnur lond, uttan nærri frágreiðing verður greitt, at Fróðskaparsetur Føroya er ein lærdur háskúli.

Slík broyting í heitinum á løgtingslógini hevur ikki broytingar við sær í føroyska lógartekstinum, og broytingarnar í danska lógartekstinum, sum fylgja av hesum, eru tilskilaðar undir § 1, pkt. 2) - 7).

Broytingarnar í § 11, stk. 3 og § 16 verða bert skotnar upp fyri at fáa betur samsvar millum føroyska og danska tekstin.

Signar Hansen
landsstýrismaður

/ Jákup Thorsteinsson

A l i t

<u>løgtingsmál nr. 110/1989: Broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Førova.</u>

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 2. mai 1990 og eftir 1. viðgerð 4. mai beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Broytingin í § 15, stk. 3 í lógaruppskotinum inniber, at § 15, stk. 2, verður sett 3 limir í staðin fyri sum nú 4 limir, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

<u>uppskot landsstýrisins.</u>

Sum pkt. 9 verður sett:	Som pkt. 9 indsættes:
"9) Í § 15, stk. 2 verður "4" broytt til: "3". Pkt. 9-10 verða pkt. 10-11."	"9) I § 15, stk. 2 ændres "4" til: "3". Pkt. 9-10 bliver pkt. 10-11."

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 18. mai 1990.

Eilif Samuelsen — Hergeir Nielsen — Jógvan á Lakjuni

Jógvan A. Johannesen — Lasse Klein

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn

4. mai 1990

Tlf. 11050 . Telex 81116 lmens fa . Telefax . 4942 . Postcode 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

L. L. j. nr. 1415-2-8

JM/cr

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 114/1989: Broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om støtte til bygning af fiskeskibe på færøske skibsværfter til eksport.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 38 frá 20. mai 1988 um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings verða gjørdar hesar broytingar:	I lagtingslov nr. 38 af 20. maj 1988 om støtte til bygning af fiskeskibe på færøske skibsværfter til eksport foretages følgende ændringer:
1) § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Til fulla ella partvísa endurrinding av serligu innflutningsgjaldinum av tilfari til bygging av dekksfiskifari í Føroyum kann skipasmiðjan fáa í studningi upp til 13% av	1) § 4, stk. 1 affattes således: "Til fuld eller delvis dækning af den særlige indførselsafgift på materiale til bygning af dæksfiskeskib på Færøerne, kan skibsværftet få et tilskud på op til 13% af skibets værdi efter vurdering. Landsstyret be-

virði skipsins eftir meting. Landsstýrinum verður heimilað at seta í gildi samsvarandi endurrindingarskipan fyri onnur fiskifør bygd í Føroyum."

2) § 6, stk. 2 verður strikað.

myndiges til at sætte i kraft tilsvarende refusionsordning for andre fiskerfartojer, bygget på Færcerne."

2) § 6, stk. 2 udgår.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 48 frá 30. mars 1990 um broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 48 af 30. marts 1990 om ændring i lagtingslov om støtte til bygning af fiskeskibe på færøske skibsværfter til eksport.

Viðmerkingar:

Av misgáum vísti broytingarlógin, løgtingslóg nr. 48 frá 30. mars 1990 (løgtingsmál nr. 8/1989), ikki til rætta grein.

Nýggja uppskotið er ein endurtøka av broytingarlógini, tó soleiðis, at víst verður til rættu greinina.

Uppskot um § 1, nr. 2 verður eisini sett fram av nýggjum. Tað datt (av misgáum?) burtur undir viðgerðini í tinginum.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/ Jørgen Hansen

Á l í t

í

løgtingsmáli nr. 114/ 1989: Broyting í løgtingslóg um ogguðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.

Málið er framlagt av landsstýrinum Lann 4. mai. 1990 og eftir 1. viðgerð 8. mai beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Undir viðgerðini vísti tað seg, at talan er um ávísing til skeiva lógargrein, og kemur tí hetta uppskot fram.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

FÍGGJARNEVNDIN, 21. mai 1990.

Anfinn Kallsberg	Flemming Mikkelsen	Heine O. Heinesen
Eilif Samuelsen	Jørgen Thomsen	Jógvan Durhuus
	Tordur Niclasen	

Á L I T

Í

Løgtingsmál nr. 115/1989: Vegir og ferdingar.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt tær o.u. 250 umsóknirnar, sum inn.komnar eru.

A.

I: Vegir

Á fíggjarløgtingsfrágini eru settar av undir gr. 13.1 106,5 mió. kr. til vegagerðir, umsiting av landsvegunum o.a.,

Viðvíkjandi nýtsluni av hesum peningi skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi:

U P P S K O T

til samtykkir

til útbygging av og ábøtur á landsvegakervini og umsiting teirra -

harumframt til bryr, ferjulegur o.a.	83.663.189 kr.
Bundið í ikki nyttum játtanum	17.942.811 -
Til niðanfyri nevndu arbeiði	4.894.000 -
	106.500.000 kr.

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
Fugloyar	- vegagerð á Kirkju	75.000
	- dyrkingarveg-uppi í Króki í Hattarvík	75.000
Svinoyar	- vegin Eystur í Hagan	150.000
Viðareiðis	- umvæling av Dala vegnum	150.000
Hvannasunds	- vegin u Fossanesi	150.000
Klaksvíkar	- dyrkingarveg út í Þorvadal	200.000
Kunoyar	- veg norður frá bygdini í Haraldsundi	75.000
	- veg norður í Hús í Kunoy	75.000
	at flyta	950.000

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
	flutt	950.000
Mikladals	- framhald av dyrkingarvegnum Gladingar-stein - niðan a Háls	75.000
	- framhald av dyrkingarvegi a Trøllanesi	75.000
Húsar	- útstykkingarveg a Húsum	100.000
	- dyrkingarveg niðan a Eið	50.000
Elduvikar	- útstykkingarveg i Elduvik	75.000
	- gera veg til tvey serhús i Funningsfirði	75.000
Oyndarfjarðar	- dyrkingarveg hjá Sigmundi Rasmussen, honda, sum er umt. 100 m norð i Bø	50.000
	- vegagerð viðvikjandi byggiplani norðuri i Bø	100.000
Fuglafjarðar	- vegagerð/byggibúning á Kambsdali	100.000
	- dyrkingarveg Vestur i Dal	50.000
Leirvikar	- liðugtgerð av bygdarvegum	100.000
	- dyrkingarveg uppi a Brekkum	50.000
Gøtu	- ibindingarveg : landsvegin i Syðrugøtu	75.000
	- ibindingarveg i landsvegin undir Gøtueiði	75.000
Runavikar	- veg yvir á Glyvradal	100.000
Nes	- veg i Lágabø á Toftum	50.000
	- veg niðan á Svangaskarð	100.000
Skála	- veg Úti á Fløtum	100.000
	- veg i Skálafirði	50.000
Sjóvar	- breiðkan av vegsvingi við nýggjari ibinding av Selvindsvegnum	75.000
	- útstykkingarveg innan Glyvur	75.000
Sunda	- framhald av útstykkingarvegi við Nordskála	75.000
	- framhald av útstykkingarvegi á Oyri	75.000
	at flyta	2.700.000

Kommuna	til	3/4 av kr.
	flutt	2.700.000
Funnings	- bygdarvegin	75.000
	- ger av brúgv um Stóra	75.000
Haldórsvikar	- nýgerð av bygdarvegi í Tjørnuvik	75.000
	- liðugtgerð av útstykkingarvegi í Vík	75.000
Hvalvikar	- ískoytisstudning til vegin í Nesvik	150.000
Hósvikar	- Kloakk	50.000
	- Útstykking	100.000
Kollafjarðar	- útstykkingarveg til bústaðaroki á Lygnesi	150.000
Kvivikar	- leingjan av vegnum úti á Nesi og planering av fiskiidnaðaroki	75.000
	- til ovara veg í Leynum	75.000
Vestmanna	- parkeringsokir	150.000
Tórshavnar	- framhald av dyrkingarvegi niðan a Skarð í Kaldbak	75.000
	- dyrkingarveg, Cornelius Reinert, Kaldbak	50.000
	- dyrkingarveg, Hanus Vang, Hoyvik	50.000
Argja	- dyrkingarveg í Sydradali	150.000
Kirkjuboar	- dyrkingarveg út á Glyvursnes	75.000
	- útstykkingarveg a Velbastað og í Kirkjubo	75.000
Hests	- Kirkjugarðsvegin	100.000
Sandavágs	- breiðkan av vegi Uppi í Brekkum	75.000
	- umvæling av Nesavegnum	75.000
Miðvágs	- byggiøkið í Vatnsoyrum	75.000
	- byggiøkið á Kirkjabø	75.000
	at flyta	4.625.000

Kommuna	til	Stuðningur 3/4 av kr.
	flutt	4.625.000
Sørvags	- meirjáttan til vegin : Úttriðingsbonum	75.000
	- meirjáttan til vegin Norður í Húsadal	75.000
Sands	- veg til Skálsafjørðingin	75.000
	- veg til Søltuvik	150.000
Skopunar	- brúgv um Stóra	75.000
	- dyrkingarveg í Høvdarhaga	100.000
Skálavikar	- veg í Núpsdali	75.000
	- brúnna um Stóra niðri á Møl	100.000
Húsavikar	- brúgv um Stóra heimanfyri Oyragarð í Dali	150.000
Skúvoyar	- dyrkingarveg norður á Stiggj	100.000
Hvalbiar	- breiðking og lutvis nýgerð av vegi frá Krógv og vestur til Hvalbiar skúla	75.000
	- framhald av dyrkingarvegi eystur í eystara buin í Sandvik	75.000
	- vegagerð í Rókatrødni í Nesi, Hvalba	75.000
Hovs	- breiðkan av vegnum eystarliga í sjálvari bygdini	150.000
Tvøroyar	- veg í Heiðunum, Froðba-Tvøroyri	100.000
	- vegin niðan á Nakk	75.000
Vágs	- niðaru brúgv um Gjógvara	75.000
	- bussstoðgistað, gongubreyt og parkeringspláss við posthúsið og skulan í Vági	75.000
	- nýggja útstykkingarvegin á Gjógvarabø	75.000
Sumbiar	- veg undir Eggini	75.000
	- veg í Lopra	75.000
	Tilsamans	6.525.000
	3/4	= 4 893.750

J. nr. 41 OS/rp
(at tilskila i svari)

Tórshavn, 12. februar 1990

II

Leadingar

Játtanir fyri figgjarárið 1990, sum samtyktar eru aður, eru hesar:
(Har einki er tilskilað, er studningurin 75% av teim nevndu upphæddunum).

Kommuna	Til	Upphædd
Svinoyar	Bátahyl í Glógvansurð	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð 85% av	600.000
	Bátahyl í Glógvansurð	
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð 85% av	700.000
Viðareiðis	Vegin undir Leiti	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	150.000
	Planering í Eiðsvik	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt	50.000
Hvannasunds	Leinging av atlagubryggjuni undir Frostvirkinum	
	(Viðareiðis- og Hvannasunds kommunur í felag)	
	(4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	400.000
	Leinging av atlagubryggjuni undir Klakavirkinum í Norðdepli	
	(Viðareiðis- og Hvannasunds kommunur í felag)	
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	400.000
Klaksvíkar	Bátahyl á Borðoyarvík	
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	700.000
	Bátahavn á Borðoyarvík	
	(4. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	650.000
	Bátabrúgvar, asfaltering, ljós, vatn v.m. í bátah. á Borðoyarvík	
	(3. ársgjald av 8. ára játtan) í gerð	400.000
Kunoyar	Bátahavn n.f. lendibrúnna í Haraldssundi	
	(5. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	200.000

Kommuna	Til	Upphædd
Kunoyar	Bátahavn í Haraldssundi	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	150.000
	Grótkast undir kirkjugarðinum í Kunoy	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	75.000
Húsa	Ídnaðaroki í Knúksdali og lending	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	100.000
Elduvikar	Leinging av atløgusiðu í Funningsfirði	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	200.000
Oyndarfjarðar	Dekksbátahavnina	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	250.000
	Sunnari vegur oman í havnina o.a.	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Fuglafjarðar	Smábátahavn	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	100.000
Gøtu	Bátahyl undir Gøtueiði	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000
	Hampan um útsiðuna av grótkastinum f.f. Harenga	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	100.000
Runavikar	Bátahyl á Glyvrum og atkomuveg	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	200.000
	Lending í Lamba og veg oman	
	(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	100.000
	Bátahyl og lendingarveg á Bakka á Glyvrum	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000
	Lending í Rituvik	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	100.000
	Bátahyl á Glyvrum	
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	100.000
	Bátahyl á Glyvrum	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	100.000
	Gomlustoð í Lamba	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
Nes	Dekksbáta- og bátahavn í Oyrunum	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	150.000

Kommuna	Til	Upphædd
Nes	Deksbátahavn og bátadrátt í Oyrunum	
	(4. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	250.000
	Brimskaða á verjugarðin og dýping av bátah. í Oyrunum	
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	400.000
	Brimskaða á verjugarðin í Oyrunum	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	200.000
Skála	Bátahyl í Skálafirði, molhøvd og dýping av bátahyli á Skála	
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	300.000
	Framhald av bátahyli í Skálafyriði og bátahyl á Skála	
	2. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	300.000
Sjóar	Útbygging av bátahylinum í Heyggstoð	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	150.000
	Bátahyl á Heyggstoð	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
	Lending á Morskranesi	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	100.000
	Atløgustóð o.a. í bátahyli á Selatrað	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	100.000
	Veg og lending Innan Glyvur í sambandi við aling	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	100.000
Sunda	Bátahyl á Oyrabakka	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000
	Grótkastið úti á Oyri	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	250.000
	Brimskaða á Grótkastið á Oyri	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	500.000
	Brimskaða á Oyri	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	200.000
Eiðis	Lendibrúgv í Svinánum	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	150.000
	Bátahyl við Ljósá	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	150.000
Gjáar	Lending í Gjónni	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt	100.000

Kommuna	Til	Upphædd
Funnings	Ábøtur a lendingina i Funningi	
	(3. ársgjald av 3 ára jattani) i gerð	100.000
Haldarsvíkar	Ábøtur á atløgusiðu i Vik	
	(4. ársgjald av 4 ára jattani ikki bygt	200.000
Hvalvíkar	Vatnveiting til havnartagið	
	(5. ársgjald av 6 ára játtani ikki bygt	100.000
	Betongdekk o.a. á kaiøkið	
	(4. ársgjald av 6 ára jattani) i gerð	300.000
	Liðugtgerð av bátahylinum	
	(3. ársgjald av 8 ára játtani bygt	200.000
Hósvíkar	Atløgubryggju fram við vegnum i bátahyli i Hósvik v.m.	
	(4. ársgjald av 6 ára játtani bygt	200.000
Kollafjarðar	Leinging av ytra armi o.a. i bátahyli við Sjógv	
	(4. áragjald av 6 ára jattani bygt	150.000
	Veg til havnaøkið s.f. Oyruna	
	(4. ársgjald av 6 ára jattani ikki bygt	150.000
	Bátahavn á Signabø	
	(3. ársgjald av 8 ára játtani ikki bygt	300.000
	Bátahylin við Sjógv, atløgusiðu v.f.	
	(2. ársgjald av 6 ára játtani ikki bygt	100.000
Kvívíkar	Brimskaða i Kvivik	
	(2. ársgjald av 2 ára játtani ikki bygt	200.000
Vestmanna	Bátahyl inni á Fjørð	
	(4. ársgjald av 7 ára játtani) bygt	200.000
Argja	Framhald av bátahavnsarbeiði á Argjum	
	(3. ársgjald av 8 ára játtani) bygt	1.000.000
	Hækking og styrking av brimgarðinum á Argjum	
	(2. ársgjald av 6 ára játtani) bygt	200.000
Kirkjubøar	Lending á Velbastað	
	(5. ársgjald av 5 ára játtani) ikki bygt	200.000
	Leinging av brimgarði o.a. á Velbastað	
	(4. ársgjald av 6 ára játtani) ikki bygt	200.000

Kommuna	Til	Upphædd
Hests	Útbygging av nyggja havnartagnum	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð 95% av	500.000
Nólsoyar	Brimverju miltum Hørgina og Eiðið	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Økið rundan um flakavirkið og avskipingarrampan	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	200.000
Sandavágs	Bátahavn	
	(4. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt	800.000
	Bátahavn	
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt	1.000.000
Miðvágs	Øking um bátahylin	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Viðkan av bátahylinum	
	(4. ársgjald av 7 ára játtan) ikki bygt	150.000
	Viðkan um bátahylin	
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt	300.000
Sørvágs	Regulering av grótkasti v.m. í bátahavnini	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	100.000
	Dýping av bátahylinum	
	(4. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	150.000
	Bátahylin	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Mykines	Bøting um lendingarviðurskiftini	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt 100% av	500.000
Sands	Atløgusiðu til bátar	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	200.000
	Ídnaðarøki úti á Stað	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	100.000
Skopunar	Planering av øki við flakavirkið	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	400.000
Skálavíkar	Dekkið e.f. fiskahúsið	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	150.000

Kommuna	Til	Upphædd
Húsavíkar	Lending i Dali	
	(5. ársgjaldi av 6 ára játtan) bygt	100.000
	Bátahavn innanfyri Skarvasker	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	400.000
	Lending á Skarvaskeri	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	300.000
	Bátahavnina	
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	300.000
	Lending i Dali, eykajáttan	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	200.000
	Bátahylin í Húsavík	
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	400.000
Skúoyar	Bátahyl	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt 85% av	500.000
	Bátahyt	
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) bygt 85% av	800.000
	Bátahylin	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt 95% av	800.000
Hvalbiar	Meirkostnað av bátasiðu í Nesi	
	(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	300.000
	Bryggja í Sandvik	
	(5. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	200.000
	Leingjan av bryggjuni í Sandvik	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	350.000
	Lendingina í Nesi, stoyping av dekki	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	150.000
	Leinging av bryggjuni í Sandvik	
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Planering av lendingarøki í Nesi	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Tvøroyar	Økið við bátahavnina (Bærentshavið)	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
	Bátahylin undir Tvørábakka	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Fámjins	Brimverju og brimskaða	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	75.000

Kommuna	Til		Upphædd
	Brimverju og leingjan av brimgarðinum		
	(3. årsgjald av 6 ára játtani ikki bygt		100.000
	Nýgerð og abotur á lending		
	(2. årsgjald av 3 ára játtan) ikki bygt		100.000
Hovs	Lending í Tjaldavik		
	(4. årsgjald av 4 ára játtan) ikki bygt		100.000
	Bátabryggju til fiskalarar		
	(3. årsgjald av 5 ára játtan) bygt		200.000
	Brimskaða á bátabryggjuna		
	(2. årsgjald av 2 ára játtan) bygt		100.000
Vágs	Økið við bátahavnina á Oyrunum		
	(4. årsgjald av 4 ára játtan) ikki bygt		250.000
Sumbiar	Bátahýl í Pollinum		
	(5. årsgjald av 5 ára játtan) í gerð		300.000
	Brimskaða o.a. í Pollinum		
	(4. årsgjald av 7 ára játtan) í gerð		300.000
	Atløgusiðu til bátar, planering o.a. í Lopra		
	(4. årsgjald av 6 ára játtan) bygt		100.000
	Pollin, bátahavn, brim- og bakkaverja		
	(3. årsgjald av 8 ára játtan) í gerð		500.000
	Bátahýl í Lopra		
	(2. årsgjald av 4 ára játtan) í gerð		100.000
	Bakkaverju í Sumba		
	(2. årsgjald av 6 ára játtan) í gerð		100.000
		75% av	22.200.000
		85% av	2.600.000
		95% av	1.300.000
		100% av	500.000
			26.600.000
		=	16.650.000
		=	2.210.000
		=	1.235.000
		=	500.000
		Tilsamans	20.595.000

YFIRLIT Í SAMBANDI VIÐ LENDINGA - JÁTTANIR OG - GRUNN

Játtað frammanundan fyri		
1990 til lendingar		20.595.000 kr.
Ikki nýttar gjaldskomnar		
játtanir pr. 31/12-1989		39.025.564 kr.
		59.620.564 kr.
Av játtanum fyri 1990 er goldið		1.517.500 kr.
		58.103.064 kr.
Í grunni pr. 31/12-1989	38.103.525 kr.	
játtað 1990	26.000.000 kr.	64.103.525 kr.
Til góðar		6.000.461 kr.

Viðvikjandi nýjáttanum skal nevndin loyva sær at seta fram soljoðandi

U P P S K O T
til samtyktar

Kommuna	til	Studningsjáttan (Har eingki er tilskilað, er studningurin 75% av upphæddini) kr.
Svinoyar	- ábøtur á lendingina a Eiðinum og i Vikini	
	3/4 av 50.000 kr/árið i 2 ár	50.000
Klaksvikar	- atløgubryggju og øki til alarar i Haraldssundi	
	3/4 av 300.000 kr/árið i 5 ar	300.000
Kunoyar	- bátahavn i Haraldssundi og grotkast undir kirkjugarðinum i Kunoy	
	3/4 av 400.000 kr/árið i 4 ar	400.000
Húsa	- lendibrúnna a Húsum	
	3/4 av 100.000 kr/árið i 2 ár	100.000
Gøtu	- liðugtgerð av brimverju i Sýtugotu	100.000
	- 3 arbeiðir i og við bátahylin i Norðagotu	
	3/4 av 100.000 kr/árið i 4 ár	100.000
Runavikar	- bátahyl á Glyvrum	
	3/4 av 200.000 kr/árið i 5 ar	200.000
	- bátahylin i Søldarfirði	
	3/4 av 100.000 kr/árið i 2 ár	100.000
	- lendingina i Rituvik	
	3/4 av 50.000 kr/árið i 5 ár	50.000
	- lendingina i Lamba	
	3/4 av 50.000 kr/árið i 5 ár	50.000
Nes	- bátahavnina inni i Oyrum á Toftum	
	3/4 av 400.000 kr/árið i 6 ár	400.000
	at flyta	1.850.000

Kommuna	til	kr.
	flutt	1.850.000
Skála	- liðugtgerð av bátahylinum á Skála og bátahyl í Skálafirði	
	3/4 av 400.000 kr./árið í 6 ár	400.000
Sjóvar	- bátahavnina á Setatrað	
	3/4 av 300.000 kr/árið í 6 ár	300.000
Sunda	- kaiøki við lendibrúnna við Norðskála	
	3/4 av 100.000 kr/arið í 4 ár	100.000
Eiðis	- brimverju á Eiðismol og bátabryggju vestan fyri P/F Norðis	
	3/4 av 200.000 kr/árið í 5 ár	200.000
Funnings	- ábøtur á lendingina í Funningi	
	3/4 av 100.000 kr/arið í 2 ár	100.000
Kollafjarðar	- arbeiðsbrúgv í tilknyti til Pf. Salmfood, Kollafirði	
	3/4 av 100.000 kr/árið í 2 ár	100.000
Kvivikar	- brimskaða í Kvivik	
	3/4 av 100.000 kr/arið í 2 ár	100.000
Vestmanna	- bátahylin í Vestmanna	
	3/4 av 500.000 kr/árið í 5 ár	500.000
Tórshavnar	- viðkan av bátahylinum á Biggjarstoð í Kaldbak	
	3/4 av 300.000 kr/árið í 5 ár	300.000
Argja	- bátahylin á Argjum	
	3/4 av 500.000 kr/arið í 6 ár	500.000
Sandavágs	- bátahavn	
	3/4 av 250.000 kr/árið í 8 ár	250.000
Sørvágs	- bátahylin í Sørvagi vegna stormskaða	
	3/4 av 50.000 kr/arið í 4 ár	50.000
	at flyta	4.750.000

Kommuna	til		kr.
	flutt		4.750.000
Sands	- veg til havnina ug bata- og dekksbátahavn		
	3/4 av 500.000 kr/árið í 6 ár		500.000
Húsavikar	- bakkan úti í Stød í Dali		100.000
	- brimskaða á Skarvaskeri og lendingatarbeiði har		
	3/4 av 300.000 kr/árið í 2 ár		300.000
Skúvoyar	- bátahyl		
	95% av 800.000 kr/árið í 6 ár	95% av	800.000
Hvalbiar	- rudding og byggibúgving av oki í Uttaru Stød í Nesi, har neystini stóðu (stormskaði)		
	3/4 av 100.000 kr/árið í 2 ár		100.000
	- bátaspil og lendingina í Nesi, Hvalba		
	3/4 av 100.000 kr/árið í 2 ár		100.000
	- ábøtur á atloguna á Fiskileiðinum í Hvalba vegna brimskaða		60.000
Hovs	- meira kaipláss til fiskaalarar og planering av øki til batadrátt		
	3/4 av 200.000 kr/árið í 5 ár		200.000
Tvøroyrar	- lendingina í Øravik		
	3/4 av 200.000 kr/árið í 4 ár		200.000
Vágs	- bingju- og parkeringsoki á Tjørn		
	3/4 av 300.000 kr/árið í 2 ár		300.000
Sumbiar	- umvæling av stormskaða á flot-brúgvarnar í Lopra		
	3/4 av 100.000 kr/árið í 2 ár		100.000
	- bakkaverju í Sumba		
	3/4 av 200.000 kr/árið í 3 ár		200.000
	Tilsamans		7.710.000
	75% av 6.910.000 = kr.		5.182.500
	95% av 800.000 = kr.		760.000
	Tilsamans		5.942.500

SAMFERDSLUNEVNDIN, 3 / 5 1990

Flemming Mikkelsen | Finnbogi Isaksson | Heini O. Heinesen

John Petersen | Svend Aage Eliefsen | Jógvan Adolf Johannessen

Lasse Klein

A l i t

II

Í

Løgtingsmál nr. 115/1989: Vegir og lendingar.

Málið er framlagt av samferðslunevndini tann 4. mai 1990 og eftir 1. viðgerð 8. mai beint aftur í samferðslunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja tað.

SAMFERÐSLUNEVNDIN, 21. mai 1990.

Flemming Mikkelsen Heini O. Heinesen Lasse Klein

Finnbogi Ísakson John Petersen Svend Aage Ellefsen

Jógvan A. Johannesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080 . Telex 81310 dinghs fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. Leygardag stongt

4. maj 1990

F. L. j. nr.

LG/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 116/1989: Broyting í lóg um innflutningsgjøld.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 13 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 1 verður pkt. 1 broytt soleiðis:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgifter.

§ 1.

I lagtingslov nr. 13 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter foretages følgende ændringer:

I § ændres pkt. 1 således:

1. Benzin og benzínblandingar undantikið benzin til flogfør: Benzin og benzinblandinger, undtaget benzin til fly:	
1.01. við innihaldi av blýggi ikki yvir 0.013 g pr. litur Med indhold af bly ikke over 0,013 g pr. liter	1 litur 3,25 kr.
1.02. við innihaldi av blýggi yvir 0,013 g pr. litur med indhold af bly over 0,013 g pr. liter	1 liter 3,75 kr.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Felagið fyri Bilhandlarar og Verkstaðseigarar hevur heitt á landsstýrið um at broyta tollin á blýfríum benzini samsett við vanligt benzin.

Grundgevingarnar eru m.a. at flestu nýggju bilar í dag eru bygdir til at nýta blýfritt benzin og um stutta tíð verður kravt í t.d. Danmark, at allir bilar eru bygdir til blýfritt benzin. T.v.s. at bilar til Føroyar í framtíðini verða fyrst og fremst til blýfritt benzin.

Í Danmark og fleiri øðrum londum er avgjaldið á blýfríum benzini lægri enn fyri vanligt benzin fyri at fremja hugin hjá bileigarum at broyta verandi bilar.

Hetta verður alt gjørt fyri at verja umhvørvið, tí blýggjmongdin í vanligum benzini hevur vánaligt árin á náttúruna.

Væntandi kann søla av blýfríum bensini frá oljufelogum setast í verk sambært niðanfyri standandi tíðarætlan:

Streymoy/Eysturoy	2. hálvár 1990
Sandoy/Vágarnar	1. hálvár 1991
Suðuroy/Norðoyggjar	2. hálvár 1991.

Samlaða provenutapið verður umleið 9 mió. kr. tilsamans, tá allir bilar hava lagt um til blýfritt bensin, væntandi um 5-7 ár. Provenutapið fyrsta árið verður uml. 1 - 1½ mió. kr. sambært upplýsingum frá oljufeløgunum.

Landsstýrið metir tað vera rætt at fremja hesi tiltøk sum lið í at minka dálkingina av umhvørvinum, og mælir til at samtykkja uppskotið.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/ Kári Petersen

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURDS- OG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 117/ 1989: Viðvíkjandi lækking av skattatrýsti

U P P S K O T

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við arbeiðsmarknaðin sum hava til endamáls at steðga lønarvøkstrinum við at lætta skattatrýsti tilsvarandi.

Viðmerkingar:

Við verandi lønarlagi her á landi hevur útflutningsvinnan og framleiðsluvinnan til heimamarknaðin lítlan og ongan møguleika at kappast við útlendskar fyritøkur.

Ásannast má, at rakstrar-og framleiðslukostnaðurin her á landi er hækkaður nógv tey seinstu árini, og er slík gongd óheppin tá hugsað verður um kappingarførleika okkara í mun til aðrar.

Ein náttúrlig avleiðing av at økatta og avgjaldstrýsti tyngist, er, at lønarkrøvini hækka samsvarandi og kemur hetta so aftur at ávirka kostnaðarstøðið til ógagns fyri framleiðsluna og kappingarførni.

Ein týðandi búskaparligur táttur er, at framleiðslan er kappingarfør og vildi hetta uppskot, soframt tað verður samtykt, bøtt munandi um hendar førleikar - landi og fólki at gagni.

At skattatrýsti lækkar og ein reallønarbati fæst er kærkomið í hesum døgum har byrðurnar hjá teim flestu kennast tyngri enn nakrantíð.

Á FØROYA LØGTINGI 1o. mei. 199o

Tordur J. Niclasen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 117 /1989: Viðvíkjandi lækking av skattatrýsti.

Málið er framlagt av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 18. mai 1990 og eftir 1. viðgerð 22. mai beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen og Jákup Lamhauge) vísir til álit hjá arbeiðsbólki, sum landsstýrið hevur sett at arbeiða við hesum spurningum og tekur tí ikki undir við fyriliggjandi uppskoti.

Minnilutin (Atli Dam) viðmerkir at vegna tess at skattalækking í samband við lønarlækking fyri at geva búskaparligar fyrimunir treytar at munandi arbeiðsloysi er í landinum og vegna tess at arbeiðsbólkurin hesum spurningum viðvíkjandi mælir landsstýrinum til at tryggja sær heimild til at taka skattalættan aftur yvir tollhækkingar um so er at arbeiðsloysi minkar, kann ikki verða tikið undir við málinum.

Minnilutin (Tórbjørn Poulsen) tekur undir við fyriliggjandi uppskoti og mælir til at hetta verður samtykt.

SKATTANEVNDIN, 25. mai '990.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

KRISTILIGT FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURÐS OG FISKIVINNUFLOKKUR.

Føroya Løgting

Løgtingsmál nr. 116/1989: Demokratisering av útvarpsmonopolinum

U P P S K O T

til

Samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til at avmonopolisera og demokratisera útvarpið/sjónvarpið, og í komandi tingsetu at seta skipanina í verk.

Viðmerkingar:

Í hesum døgum tá ein túrur fyri og annar eftir reglar í londum eystanfyri eiga okkara egnu monopolmúrar nú eisini at rapla.

Útvarp Føroya er komið fyri at vera, men skipanin um einkarrætt eigur at verða niðurlagd.

Í grannalondum okkara siggja vit, at ein støðug demokratisering á hesum økt fer fram, og at fleiri sokallaði lokal- og nærradio eru tarin at virka.

Her á landi eru bæði felagsskapir og persónar klárir fyri slíkum virksemi, men tá ásannast, at útvarpsmonopolið við sínum lógarfestum einkarrætti beinleiðis er ein forðing fyri nakrari menning á hesum øki.

Pressufrælsinum vildi tað verið ein sigur um uppskot okkara varð samtykt og somuleiðis hesum týðandi mentunarøki ein stimbran.

Á FØROYA LØGTINGI 10. mei 1989

Tordur J.Niclasen

Álit

frá

løgtingsmáli nr. 118/1989: Demokratisering av útvarpsmonopolinum.

Málið er framlagt av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 18. mai 1990 og eftir 1. viðgerð 22. mai beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg fýra minniluttar.

Ein minniluti (Eilif Samuelsen og Hergeir Nielsen) vísir á at landsstýrið er tarið undir at endurskoða samlaðu lóggávuna um útvarpið og sjónvarpið og í tilknýti til hesa viðgerð er tátturin um nærvarpið eisini frammi. Ein arbeiðsbólkur er settur og landsstýrið roknar við at hetta arbeiði er liðugt í heyst. Út frá hesum tekur nevndi minniluti ikki undir við málinum og setur einki uppskot fram.

Ein minniluti (Jógvan á Lakjuni) førir fram at tað er umráðandi at fjøltátta og demokratisera fjølmiðlarnar. Ein demokratiseing av útvarps- og sjónvarpseinkarrættinum hevði loyst stórar skapandi kreftir í fólki okkara og hevði verið við til at byrgt upp fyri tí stóru útlendsku árinum í upplýsingarfloymum uttaneftir. Fólkaflokkurin hevur fleiri ferðir havt líknandi mál fyri og kann tí í prinsippinum taka undir við uppskoti Kristiliga Fólkafloksins. Men vitandi um at ein nevnd, sett av landsstýrinum, arbeiðir við øllum fjølmiðlaspurninginum, her uppi í eisini útvarps- og sjónvarpseinkarrættinum, mælir minniluttin til at bíða málið í landsstýrið.

Ein minniluti (Jógvan Adolf Johannessen) førir fram at Javnaðarflokkurin heldur tað ikki verða beint at gera sum skotið er upp, men í staðin útbyggja núverandi stovnar og møguliga geva fólki høvi til at koma framat við sjónarmiðum.

Ein minniluti (Lasse Klein) tekur støðu í tingsalinum.

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 25. mai 1990.

Eilif Samuelsen Hergeir Nielsen Jógvan á Lakjuni

Jógvan Adolf Johannessen Lasse Klein

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURÐS-OG FISKIVINNUFLOKKUR.

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 12o/1989: Stovnsetan av grunni til fígging av dálkingarfyribyrgjandi tiltøkum.

U P P S K O T

til

samtyktar

"Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot til stovsetan av grunni til fígging av dálkingarfyribyrgjandi tiltøkum og at leggja hetta uppskot fyri tingið í komandi tingsetu"

Viðmerkingar:

Dálkingarvandin viðkemur okkum øllum og er tað umráðandi, at tað sum gerast kann verður gjørt til tess at seta í verk dálkingarfyribyrgjandi tiltøk.

Dálkingar kelduir kunnu vera ymiskar, men tó hava tað til felags, at tá spurningurin um dálkingarfyribyrgjandi tiltøk tekur seg upp, er tað oftast ein spurningur um manglandi førleika fyri fígging.

Kommunur kring landið hava ~~jøvnum~~ gjørt vart við seg og søkt um stuðul til at minka um dálkingarvandan. Tær hava vilja, men ikki megnað orsakað kostnaðin av neyðugum tiltøkum.

Kanningar vísa at umhvørvið, fysisk planlegging av lirðum og sundum, alivinna og dálkandi virkir á landi eru knýtt saman á ein slíkan hátt, at neyvan ber til at skilja tey sundur.

Tí er eisini neyðugt at karmur verður gjørdur um hvør og í hvønn mun útreiðslurnar av dálkingarfyribyrgjandi tiltøkum skulu berast av avvarðandi dálkingarkeldum.

Umtalaði grunnur kundi skapt fortreytir fyri, at gongd kom á dálkingarfyribyrgjandi virksemi, og kundi fíggjarorka grunnsins fingist til vega við játtan á fíggjarlógini umframt kommunur, virkir v.m. goldið ávísa upphædd eftir nærri fyriskipaðum reglum.

Á FØROYA LØGTINGI 1o. mei. 199o

Tordur J. Niclasen

764

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11080 - Telex 81310 lingms fa - Telefax 84942 Pósthólf 64
Vygreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

16. mai 1990

F. L. j. nr. 1010-17-1

IG/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 122/1989: Søla av parti av fastogn landsstýrisins í Vági.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um sølu av einum parti av fastogn landsstýrisins í Vági.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at selja matr. nr. 654, Vágur, sum er bygningur á leiguøki.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om salg af del af landsstyrets faste ejendom i Vági.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at sælge matr. nr. 654, Vágur, som er en bygning på lejet grund.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Í sambandi við, at landsstýrið hevur sett í verk eina skráseting av landsins føstu ognum og eisini eina kenning av, í hvørjum standi ognirnar eru, hevur landsstýrið samtykt at biðja løgtingið um heimild til at selja Loranstøðina á Skúvanesi.

Loranstøðin á Skúvanesi varð bygd í 1969 og er til 200 m^2 netto

í 2 hæddum, t.v.s. 400 m^2.

Ognin stendur á leiguøki og er tað umleið 35.640 m^2 til støddar og leigan er góðar 16.000 kr. árliga.

Uttan eru húsini í góðum standi, men innan heldur vánaligt. Um húsini ikki skulu bliva heilt oyðiløgd, mugu umvælingar gerast beinanvegin, ella mugu húsini seljast.

Tað er trupult at siga, hvussu nógv umvælingin fer at kosta, tí el-veitingin og hitaanleggið virkar ikki. Um innrættingin verður sum hon er, og parkettgólvið, hurðar og veggir ikki hava fingið alt ov stóran skaða av vætu, og tað sæst ikki fyrr enn hiti kemur aftur í húsini, so kostar umvælingin í minsta lagi 300.000 kr.

Landsstýrið heldur, at tað er eingin orsøk til, at tað almenna skal eiga ogn ymsa staðni í landinum, tá so er, at tað almenna sjálvt ikki hevur brúk fyri húsunum.

Hetta verður gjørt fyri at sleppa undan útreiðslum til viðlíkahald, tryggingar o.a.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/Súsanna Danielsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 122/1989: Søla av einum parti av fastogn landsstýrisins í Vági.

Málið er framlagt av landsstýrinum dann 18. mai 1990 og eftir 1. viðgerð 22. mai beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutа og minnilutа.

Meirilutin (Anfinn Kallsberg, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Jógvan Durhuus, Heini O. Heinesen og Jørgen Thomsen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Tordur Niclasen) er av teirri áskoðan, at fær landsstýrið heimild til umtalaðu sølu, so er tað rímiligt at henda verður framd til eitthvørt sosialt/vælgerandi endamál.

Tí verður sett fram soljóðandi

U P P S K O T

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at selja matr. nr. 654 í Vági til eitt hvørt sosialt/vælgerandi endamál.

FÍGGJARNEVNDIN, 25. mai 1990.

Anfinn Kallsberg Flemming Mikkelsen Jógvan Durhuus

Eilif Samuelsen Heine O. Heinesen Tordur Niclasen

Jørgen Thomsen

SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 123/1989: VHF-samskiftið á Føroyaleiðini.

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa so fyri, at møguleiki verður fyri samskifti við land á VHF á allari innaru føroysku landleiðini.

Viðmerkingar:

Til tess at økja um trygdina hjá smábátum, hevur Føroya Løgting samtykt lóg um "bjargingarútgerð á bátum undir 5 br. tons", løgtingslóg nr. 38 frá 29. mai 1985.

Henda lóg áleggur opnum bátum frá áttamannafari og uppeftir og dekstørum undir 5 br. tons m.a. at hava neyðsendara av VHF slag um borð.

Men tað er eitt ávist ósamsvar millum lógina um bjargingarútgerð á bátum og tann veruleika, at møguleikin fyri at fáa boð frá sær er ikki alla staðir, har hesir bátar ferðast. Serliga eru trupulleikar á innara parti av Norðhavinum og í Dúpunum, har nógv ferðsla er.

Sum er, er tað Post- og Telegrafverkið, sum hevur ábyrgdina av Tórshavn Radio, og hvat har til hoyrir, og er hesin stovnur ikki sinnaður at útbyggja sendinetið soleiðis, at tað lýkur tey krøv, sum Føroya Løgting má hava havt fyri eyga, tá tað í 1985 samtykti lógina um bjargingarútgerð á

bátum, so eiga vit sjálvir at gera tað.

Áðurnevnda lóg frá 1985 um bjargingarútgerð á bátum undir 5 br. tons hevur álagt hesum bátum eina ikki lítisverda útreiðslu. Men trygdin, hon var ætlað at veita hesum somu bátum, kann vísa seg at vera følsk.

Hetta mál í nakað øðrvísi líki hevur áður verið umrøtt á tingi. Í 1986-tingsetuni mælti Framsóknarflokkurin til at seta eina VHF-støð á Eiðiskolli. Hetta mál vann ikki fram.

Tí verður málið reist av nýggjum.

Á FØROYA LØGTINGI, 16. mai 1990.

Tórbjørn Poulsen

Álit

í

løgtingsmáli nr. 123/1989: VHF-samskiftið á Føroyaleiðini.

Málið er framlagt av Sjálvstýrisflokkinum tann 15. mai 1990 og eftir 1. viðgerð tann 18. mai beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Víst verður á, at í løgtingssetuni 1986 legði Framsóknarflokkurin fram tingmál um VHF-móttakara/sendara á Eiðiskolli. Eftir uppskoti frá samferðslunevndini samtykti løgtingið at heita á landsstýrið at taka upp samráðingar við danska Post- og Telegrafvæsenet viðvíkjandi spurninginum um møguliga at fara upp í hæddina við nýggjari VHF-støð.

Nevndin er samd um, til tess at økja um trygdina, er neyðugt, at møguleiki er fyri samskifti við land á VHF á allari innari føroysku landleiðini, og tekur tí undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot Sjálvstýrisfloksins.

FISKIVINNUNEVNDIN, 25. mai 1990.

Svend Aage Ellefsen — Suni Jacobsen — Jákup Lamhauge

Jógvan Durhuus — Petur Reinert — Henrik Old

Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Gf. 11080 . Telex 81310 tinghs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Vegnarsloytið: Kl. 10—15, leygardag stongt

16. mai 1990

F. L. j. nr. 430-5-34
Tal tilskalað á svarið

KP/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 124/1989: Góðkenning av sáttmála millum Danmark, Føroyar, Grønland, Finland, Ísland, Noreg og Sverriki um hjálp í skattamálum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at hjálagdi sáttmáli millum Danmark, Føroyar, Grønland, Finland, Ísland, Noreg og Sverriki um hjálp í skattamálum frá 7. desember 1989 verður lýstur at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Tann 1. januar 1987 kom í gildi í Føroyum sáttmáli millum donsku ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri til at sleppa undan tvískatting av inntøkuskattum og um hjálp í skattamálum.

Hesin sáttmáli er tann 1. januar 1990 avloystur av sáttmála millum tey norðurlendsku londini at sleppa undan tvískatting av inntøku- og ognarskattum. Tann norðurlendski skattasáttmálin var undirskrivaður í Helsingfors tann 12. september 1989.

Norðurlendski skattasáttmálin er undirskrivaður av Føroya Landsstýri við heimild í § 155 um tvískattasáttmálar í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983. Partarnir eru Danmark, Finland, Føroyar, Ísland, Noreg og Sverriki.

Hjálagdi hjálpisáttmáli er millum Danmark, Finland, Føroyar, Grønland, Ísland, Noreg og Svøriki og heimilar londunum at hjálpa hvørjum øðrum í skattamálum, tá ið tað kemur til:

a) at kunngera skjøl,
b) at lýsa skattamál, eitt nú at útvega sjálvuppgávur ella aðrar fráboðanir, at skifta upplýsingar sjálvkravdir elle eftir áheitan í einstøkum føri,
c) at fáa til vega sjálvuppgávur og onnur skattaútfyllingarbløð,
d) at atgerðir, sum skulu byrgja fyri at fyribilsskattur verður tikin í meira enn einum riki,
e) skattainnkrevjing,
f) skattaflutningur og
g) skattainnheinting og trygdarveiting fyri at skattkrøv verða goldin sambært § 1.

Sambært § 2 hevur eitt sáttmálabundið riki skyldu at koma hinum ríkjunum til hjálpar í øllum skattamálum.

Dupultskattasáttmálin millum Danmark og Føroyar hevði reglurnar um hjálp í skattamáli skrivaðar í sjálvum dupultskattasáttmálanum, meðan millum norðurlondini er ókið býtt í tveir sáttmálar.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at góðkenna hjálpisáttmálan, av tí at hann er avgjørt neyðugur í málsviðgerðini um skattamál millum tey sáttmálabundnu ríkini. Heimildin til at sleppa undan tviskatting er í skattasáttmálanum, meðan reglurnar til at gjøgnumføra til fulnar reglurnar í hesum skattasáttmálanum eru treytaðar av hjálpisáttmálanum.

Sáttmálin kemur í gildi tríatianda dagin eftir tann dag, tá ið øll sáttmálabundnu ríkini hava boðað danska uttanríkismálaráðnum frá, at sáttmálin er góðkendur. Danska uttanríkismálaráðið boðar síðani hinum sáttmálabundnu ríkjunum frá, at tað hevur fingið hesi boð og nær sáttmálin kemur í gildi sambært § 24.

Tann málsviðgerð, sum sostatt skal til, er, at løgtingið

góðkennir sáttmálan, og at landsstýrið síðani boðar danska uttanríkismálaráðnum frá hesum. Tá ið uttanríkisráðið hevur fingið somu boðini frá hinum sáttmálabundnu ríkjunum, boðar tað frá, nær sáttmálin kemur í gildi.

+ skjal

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

/Kári Petersen

Sáttmáli
millum
tey norðurlendsku londini
um hjálp í skattamálum

Ríkisstjórn Danmarkar saman við Føroya landsstýri og grønlendska landsstýri og ríkisstjórnirnar í Finnlandi, Íslandi, Noregi og Svøríki,

sum ynskja at gera ein sáttmála um hjálp í skattamálum og

sum ásanna, at hvat viðvíkir Føroyum og Grønlandi tey málsøki, sum hesin sáttmáli fevnir um sjálvt mótvegis útlondum, hoyra undir Føroya og Grønlands sjálvstýri,

eru samd um:

Vanligar viðmerkingar

Grein 1

Tey sáttmálabundnu ríkini binda seg til at veita hvørjum øðrum hjálp í skattamálum, tá ið tað kemur til:

a) at kunngera skjøl,
b) at lýsa skattamál, eitt nú at útvega sjálvuppgávur ella aðrar frábøðanir, at skifta upplýsingar sjálvkravdar ella eftir beiðan í einstøkum førum,
c) at fáa til vega sjálvuppgávur - og onnur skattaumfyllingarblað,
d) atgerðir sum skulu fyrireika fyri at fyribilsskattur verður tikin í meira enn einum riki,
e) skattainnkrevjing,
f) skattaflutningur og
g) skattainnheinting og tryggdarveiting fyri at skattakrov verða goldin.

Grein 2.

1. Galdandi skattir, har nevin sáttmáli skal verða nýttur, eru:

a) í Danmark:
   1. inntøkuskattur til ríkið,
   2. inntøkuskattur til kommunur
   3. inntøkuskattur til amtskommunur,
   4. serligur inntøkuskattur,
   5. kirkjuskattur,
   6. skattur av vinningsbýti,
   7. rentuskattur,
   8. skattur av nýtsluejaldi,
   9. skattur eftir kolvetnisskattalógini,
   10. ognarskattur til ríkið og
   11. sjómansskattur;

b) Í Føroyum:

1. Inntøkuskattur til landskassan;
2. Inntøkuskattur til kommunur,
3. kirkjuskattur,
4. skattur av vinningsbýti og
5. skattur av nýtslugjaldi (royalty);

c) Í Grønlandi:

1. landsskattur,
2. serligur landsskattur,
3. kommunuskattur,
4. skattur av vinningsbýti,
5. felagskommunalt skattur og
6. kelvatnisskattur;

d) Í Finnlandi:

1. inntøku- og ognarskattur til ríkið,
2. skattur til kommunur,
3. kirkjuskattur, og
4. kelduskattur;

e) Í Íslandi:

1. inntøkuskattur til ríkið,
2. inntøkuskattur til kommunur og
3. ognarskattur til ríkið;

f) Í Noregi:

1. inntøku- og ognarskattur til ríkið,
2. inntøku- og ognarskattur til kommunur,
3. inntøkuskattur til "fylkene",
4. felagsskattur til "skattefordelingsfonden"
5. skattur eftir steinoljuskattalógini,
6. avgjaldið til ríkið av samsyningum til útlendsk listafólk og
7. sjómansskattur;

g) í Svørikí:

1. inntokuskattur til rikið, iroknað sjómansskattur og "kupanskattur",
2. loyvisavgjald fyri avisar almennar tramførslur,
3. "ersattningsskatten",
4. "utskiftningsskatten",
5. "vinstdelningsskatten",
6. inntokuskattur til kommunur, og
7. ognarskattur til rikið;

h) í øllum sáttmálabundnum londum:

1. arva- og gevuavgjald.
2. motoravgjald í tann mun tey eru tilskilað í sáttmála sambært § 20;
3. meirvirðisavgjald og annað vanligt soluavgjald í tann hetta er tilskilað í sáttmála sambært § 20;
4. serøtluskattur í tann mun hann er tilskilaður í sáttmala sambært § 20;
5. almannatryggingargjald og onnur gjøld til ta almenna í tann mun hetta er tilskilað í avtalu sambært § 20.

Javnt við skatt verður at seta fyribilsgjald av slikum skatti og avgjaldi, sum liðra a) - g) í hesi grein fevna um.

2. Sáttmalin skal eisini verða nýttur um allar skattir av sama ella nærum sama slag, sum, eftir at hesin sáttmálin er undirskrivaður, verða álikmaðir sum íkoyti til ella í staðin fyri galdandi skattir.

Grein 3.

1. Um ikki annað sæst av ti sambandi, málburðurin verður havdur á, er nevning hansara í hesum sáttmála, sum niðanfyri tilskilað:

a) Málbering "sáttmálabundið riki" merkir Danmark, Finnland, Ísland, Noreg og Svøriki; tá ið hesin sáttmáli verður nyttur umfatar málbering eisini Føroyar og Grønland, sjálvstýrandi tjóðir í danska rikinum;

b) málbering "málsrættandi myndugleiki" merkir:
   1) í Danmark: skattamálaráðið;
   2) í Føroyum: Líkningarráð Føroya;
   3) í Grønlandi: Skattadirektoratið;
   4) í Finnlandi: Tiggjarmálaráðið;
   5) í Íslandi: Tiggjarmálaráðið;
   6) í Noregi: Tiggjar- og tollráðstovan;
   7) í Svøriki: Tiggjarmálaráðið

ella tann myndugleiki í einhvørjum av hesum rikjum, sum er heimilaður at taka sær av spurningum hesum sáttmála viðvikjandi.

c) "Tann norðurlendski tvískattasáttmálin" merkir sáttmáli dagfestur 12. september 1989 millum tey norðurlendsku londini at sleppa undan tvískatting av inntøku- og ognarskattum og sáttmáli dagfestur 12. september 1989 millum Danmark, Finnland, Ísland, Noreg og Svøriki um arva- og gávuskattir og likir sáttmálar millum tey norðurlendsku londini, sum, eftir at hesin sáttmálin er undirskrivaður, verða gjørdir javnlikis ella í staðin fyri hesar sáttmálar.

Grein 4.

1. Eitt sáttmálabundið ríki hevur eftir 1. grein skyldu at koma til hjálpar í øllum skattamálum og viðvíkjandi øllum skattakrøvum, sum eru ikomin í einum øðrum sáttmálabundnum ríki í samsvari við lóggávuna hjá hesum sama ríki um skattir, gjøld og avgjøld sum 2. grein fevnir um.

2. Hjálpartænastan ber í sær atgerðir ikki bert mótvegis ti skattaskyldugu, men eisini mótvegis øðrum, sum sambært lóggávuni í ti sáttmálabunda ríkinum sum áheitanina fær, hava skyldu at veita skattamyndugleikunum stuðul.

3. Áheitan um hjálp má bert verða gjørd um so er at tær kravdu atgerðirnar ikki kunnu verða framdar í egnum ríki uttan avgerandi trupulleikar, og um so er at tað ríki, sum kemur við áheitanini sambært egna lóggávu kann veita somu hjálp eftir áheitan frá ti sáttmálabundna ríkinum sum áheitanina fær.

4. Áheitan um hjálp og skrivaskifti millum tey sáttmálabundnu ríkini eftir hesum sáttmála verða framd av málsraðandi myndugleikum í hesum ríkjum.

Grein 5.

1. Áheitanir og onnur skjøl í málum um hjálparveiting skulu vera orðað á donskum, norskum ella svenskum, aðramáta skal umseting til eitt av hesum málum vera hjálagt. Í kunngerðarmálum er hetta kortini bara galdandi um áheitanina um kunngerðing.

2. Í áheitanini um hjálpina skal vera sagt frá hvør myndugleiki upprunaliga hevur biðið um hana og somuleiðis um navn, starv ella navnbót, bustað, føðingardag og heimstaðarkommuna og, tá ið til ber,

vinnustað og tilhald hjá ti persóni, sum skattamálið er um. Áheitanin skal eisini hava upplýsingar um aðrar umstøður til leiðbeiningar um, hvør hesin persónur er.

Grein 6.

1. Heimilt er at nokta hjálp, tá ið tað sáttmálabundna riki, sum áheitanina fær, heldur nana vera í stríð við almennu áhugamál sini.

2. Tá ið spurningurin um nýtslu av einari reglu í tí norðurlendska ríviskattasáttmálanum er lagdur fyri tí málsráðandi myndugleikanum í tí sáttmálabundna rikinum, ið hevur fingið áheitanina um hjálp, kann viðkomandi riki, eftir avtalu við tað sáttmálabundna riki, sum hevur biðið um hjálp, steðga áheitanini um hjálp til skattainnkrevjing.

Grein 7.

1. Um áheitan um hjálp verður havnað, skal sáttmálabundna rikið, sum hevur biðið um hjálp, so skjótt sum til ber fáa at vita um avgerðina og grundir hennara.

2. Verður hjálpin framd, skal tað sáttmálabundna rikið, sum áheitanina fekk, so skjótt sum til ber, gera hitt sáttmálabundna rikið kunnugt um úrslitið av hjálparveitingini.

3. Fráboðan eftir hesi grein eiga eisini at siga frá slikum umstøðum, sum kunnu hava týdning fyri framhaldandi viðgerð skattamálsins.

Grein 8.

1. Skjøl, sum dómstólur ella fyrisitingarmyndugleiki hjá einum av teimum sáttmálabundu ríkjunum hevur sett upp ella váttað, nýtast ikki at verða løggild til tess at verða nýtt í skattamálum á virkisøki hjá einum sáttmálabundnum riki.

2. Sama er við skjølum, sum tænastumaður hjá dómstóli ella myndugleika hevur undirskrivað, tá ið sovorðin undirskrift er nógmikil sambært løggávuni hjá sáttmálabundna ríkinum, sum dómstólurin ella myndugleikin hoyrir til.

Kunngering av skjølum.

Grein 9.

1. Kunngering sambært hesum sáttmála fer fram á sama hátt, sum tá ið samsvarandi kunngeringar verða framdar eftir lóg ella umsitingarligari venju hjá ti sáttmálabundna ríkinum, sum hiðið er at kunngera. Í áheitanini um kunngering skal í stuttum máli verða greitt frá innihaldinum í skjalinum.

2. Um so er at tað sáttmálabundna ríkið, sum krevur kunngering, biður um hetta, kunnu serlig formkrøv vera løkin við kunngeringina, í tann mun tann kravda mannagongdin er í samsvar við løggávuna hjá ti sáttmálabundna ríkinum, sum skal seta kunngeringina í verk.

3. Prógv um kunngeringina skal annaðhvort vera dagfest og váttað viðurkenning frá tí, sum kunngjørt varð fyri, ella váttan frá avvarðandi myndugleika hjá sáttmálabundna ríkinum, har kunngering var kravd, og skal tað vera tilskilað í hesi váttan, hvussu og nær kunngeringin er farin fram.

Krav um upplýsingar v.m.

Grein 10.

1. Upplýsingar skulu verða krafdir í samsvari við lóggavuna hjá tí sáttmálabundna ríkinum, sum hevur fingið áheitanina um at krevja teir inn.

2. Áheitan um krav um upplýsingar kann verða gýtt, um so er at handils- verksmiðju- ella vinnulógynidómar hevdu verið lagdir burir, um áheitanin varð gingin á møti.

Grein 11.

1. Málsráðandi myndugleikin í einum sáttmálabundnum ríki skal, í tann mun sum tað er gjørligt út frá atkomiligum eftirlitsupplýsingum ella líkum upplýsingum, so skjótt sum til ber, tá ið hvørt almanakkaár er liðið, sjálvkravdur senda málsráðandi myndugleikanum hjá einum og hvørjum av hinum sáttmálabundnu ríkjunum upplýsingar viðvikjandi persónum, busettir har, ella løgfrøðiligum persónum við heimstaði har, tá ið tað snýr seg um:

a) útluting hjá partafeløgum og øðrum løgfrøðiligum persónum,
b) rentu av skuldarkrøvum og tílíkum virðisskjølum,
c) ógn hjá bankum, sparikassum og tílíkum stovnum og rentur av slíkum ógnum,
d) fasta ogn,
e) nýtslurættargjald og onnur tíðarvís avgjald fyri at nýta upphavsrætt, einkarrættindi, mynstur, vørumerki ella onnur tílík rættindi ella ogn,
f) lønir, samsyningar, eftirlønir og lívrentur,
g) skaða-, tryggingar- og annað líkt engurgjald, fingið í samband við vinnuligt virksemi og
h) aðrar inntøkur ella ognir og í tann mun sáttmáli um hetta verður gjørdur sambært 20. grein.

2. Málsraðandi myndugleikin í einum sáttmálabundnum riki skal ávirka at upplýsingar, sum koma fram við kanning í hesum sáttmálabundna rikinum í máli um skatting, og sum kann hava áhuga hjá einum øðrum sáttmálabundnum riki, sum skjótast verða sendar málsraðandi myndugleikanum hjá hesum seinna rikinum.

3. Um tað nú kemur til sjendar í einum sáttmálabundnum riki, sum upplýsingarnar fekk, at tær eru ikki samsvarandi teimum veruligu viðurskiftunum, tá skal málsraðandi myndugleikin í hesum riki á hóskandi hátt kunna málsráðandi myndugleikan hjá tí sáttmálabundnu rikinum, sum hevur latið upplýsingarnar, um hetta.

4. Tá ið soleiðis ber á, at persónur, busettur á virkisøkinum hjá einum av teimum sáttmálabundnu rikjunum, er deyður og hevur latið eftir seg fasta ogn, sum liggur á virkisøkinum hjá einum øðrum sáttmálabundnum riki ella ognir, sum standa í virki har, tá skal málsráðandi myndugleikin hjá fyrstnevnda rikinum, so skjótt sum tað fær at vita um hesi viðurskifti, kunna málsráðandi myndugleikan hjá hinum seinna rikinum um hetta.

Grein 12.

1. Tvey ella fleiri sáttmálabundin riki skulu eftir áheitan frá einum teirra samráðast sínamillum við tí í hyggju at avráða hvørji mál, ið skulu koma undir samtíðaskattakanningar og mannagongdina í tí sambandi. Hvørt sáttmálabundna rikið, sum málið nemur við, ræður sjálvt fyri, um tað vil taka lut í ávísari samtíða skattakanning.

2. Samtíða skattakanning smb. 1. stykki er tann skipan millum riki, tvey ella fleiri, at tey hvørt á sínum øki skulu kanna ávís skattaviðurskifti, tá ið soleiðis ber til at sáttmálabundnu rikini hava felags ella afturatknyttan áhuga og við tí endamáli at skifta allar týðandi upplýsingar, sum koma fram sínámillum.

Grein 13.

1. Umboð fyri einum myndugleika í einum sáttmálabundnum riki kann í skattamáli, sum hevur veruligan áhuga hjá hesum riki, eftir áheitan frá sama riki, loyvast vera hjástatt við kanningina í sovorðnum skattamáli hjá hinum sáttmálabundna rikinum. Málsráðandi myndugleikin hjá hesum seinna nevnda riki viðger áheitanina og skal tað sum skjótast boða málsráðandi myndugleikanum hjá fyrrnevnda rikinum frá avgerð sini. Verður áheitanin ertirlikað, skal tað vera tilskilað í fráboðanini, nær og hvar kanningin fer fram, og somuleiðis allar upplýsingar, sum hildnar verða eftirlýnskjandi hjá tí málsráðandi myndugleika, sum setti fram áheitanina.

2. Tey umboð, sum fyrsta stykki nevnir um, kunnu ikki taka nakra avgerð í spurningum í samband við kanningina, men hava høvi til at leggja uppskot viðvikjandi slíkum spurningum fyri tann myndugleika ella tænastumann, sum er biðin um at gera kanningina. Hesin myndugleiki ella tænastumaður eigur avgerðina, sum stendst av slíkum uppskotum.

3. Upplýsingar, sum eru framkomnar við kanningini, vera viðfarnar sum loyniligar og mugu ikki verða latnar øðrum persónum ella myndugleikum ei heldur persónum, sum eru í tænastu við dómstólar og aðrar rættarligar myndugleikar uttan teimum, sum hava skattaálíkning (skatting), innkrevjing ella innheinting skatta um hendi, sum henda avtala fevnir um ella sum taka avgerðir um klagur ella ákæruspurningar í ti sambandi.

4. Verður ikki gingið teirri áheitan, sum ummæld er í fyrsta stykki á møti, verða ásetingarnar í grein 7 1. stykki nýttar á líkan hátt.

Innheinting skatta.

Grein 14.

1. Avgerðir í skattamálum, sum eftir lóggávuni í einum sáttmálabundnum riki eru innandi í hesum rikinum, skulu verða viðurkendar sum innandi í øðrum sáttmálabundnum riki.

2. Spurningar, sum viðvikja einum og hvørjum tíðarskeiði eftir at eitt skattakrav ikki longur kann verða tvingsilsfulnað, verða at avgera sambært lóggávuni hjá áheitandi rikinum.

3. Innheintingaratgerðir hjá rikinum, sum á er heitt, og sum eftirlíkar áheitanini um hjálparveiting, lá eftir lóggávuni hjá hesum riki høvdu frestað ella slitið tað tíðarskeið, sum nevnt er í 2. stykki, skulu hava henda sama virknað eftir lóggávuni hjá tí áheitandi rikinum. Rikið, sum á er heitt, skal kunna áheitandi riki um nevndu atgerðir.

4. Tann myndugleiki, sum av fyrstu hond krevur hjálparveiting til innheintingar, skal vatta í sini áheitan, at avgerðin er innandi og gera vart við, nær rætturin til tvingsilsinnheintingar heilt ella lutvis heldur uppat vegna fyrningar; málsøkið hjá hesum myndugleika, skal ein teirra myndugleika, sum § 3 fatar um, hava váttað.

Grein 15.

Er skattskyldugi ella annar persónur, sum 2. stk. í 4. grein fevnir um, deyður, verður ikki meira heintað inn enn svarar til virðið á ognunum í deyðsbúnum. Er búgvið skift, verður ikki meira heintað inn frá arvingum ella øðrum, sum ognaðust nakað orsakað av andlátinum, enn tað sum svarar til ognirnar ta stund, teimum ognaðist tær.

Grein 16.

1. Slíkur sérlegur forréttur, sem kann vera gildandi viðvíkjandi eignum skattum í tí sáttmálabundna ríkinum, sum er bíðið um hjálparveiting, er ikki gildandi viðvíkjandi skatti, sum verður heintaður inn samsvart hesum sáttmála.

2. Í skattainnheintingarmálum sambært hesum sáttmála má rætturmál ikki verða byrjað - fyri dórum dómstoli ella fyrisitingarligum ella viðgerð - hjá tí sáttmálabundna ríkinum, har tvingsilsinnheintingin er krevd - uttanso, at málsviðandi myndugleikin í hesum ríkinum eftir áheitan frá málsvarandi myndugleikanum í hinum ríkinum, sum setur fram áheitanina, samtykkir slíka atgerð í serstøkum føri.

Grein 17.

1. Heldur - áðrenn skattinnheintingarmál sambært hesum sáttmála er lokið - rætturin til at heinta inn skattin uppá heilt ella lutvist sambært lóggávuni hjá tí sáttmálabunda ríkinum, sum hjálparveitingina hevur kravt, tí ar skatturin er goldin ella av aðrari orsøk niðursettur ella skattaálikningin eftirtikin ella lætt, tá skal málsraðandi myndugleiki í hesum ríki so skjótt sum tíl ber boða málsraðandi myndugleikanum hjá hinum málsraðandi ríkinum frá hesum.

2. Ásetanirnar í hesi grein verða nýttar á líkan hátt, um so er, at gjaldsfreist er eftirlíkað viðvíkjandi skattagjaldingini.

Grein 18.

Tá ið innheinting eftir hesum sáttmála er framd í einum sáttmálabundnum ríki og tann innheintaða upphæddin er komin innheintingarmyndugleikanum í hesum ríki í hendi,

hevur hetta riki ábyrgdina av teirri innheintaðu upphæddini mótvegis ti sáttmalabundna rikinum, sum innheintingina kravdi.

Trygdarveiting fyri skattakrevagjalding

Grein 19.

1. Trygdarveiting fyri skattgjalding sambært hesum sáttmala skal ganga eftir galdandi lógarreglum ella fyrisitingarligari venju hjá ti sáttmalabundna rikinum, sum trygdarveitingin verður kravd hjá. Það skal bera til at fáa trygd, tó at kravið er ikki asett.

2. Er nú skattakravið heilt ella lutvist burturrættið eftir at fyrireikingar viðvikjandi trygdarveiting sambært hesum sáttmala eru gjørdar, tá skal málsraðandi myndugleikin í ti sáttmalabundna rikinum, sum gjørdi áheitanina, so skjótt sum til ber boða málsraðandi myndugleikanum hjá hinum sáttmálabundna rikinum frá hesum.

3. Ásetingarnar í greinunum 14-18 skulu í tann mun tað er gjørligt eisini verða nyttar um trygdarveiting fyri gjald av skattakrevum sambært hesum sáttmala.

Serligar ásetanir

Grein 20

1. Málsraðandi myndugleikar í sáttmálabundnu rikjunum kunnu gera sáttmála fyri at fremja ásetanirnar í hesum sáttmála. Teir kunnu serstakliga gera sáttmála um at skifta upplýsingar sínámillum sambært grein 11, 1. stykki, h), um minstalagsuppnædd, tá ið innheinting verður kravd, um hjálparveiting viðvikjandi skattum og avgjøldum sambært grein 2, 1. stk., h), 2-5, um atgerðir til tess at fyribyrgja at fyribilsskattur verður tikin meir enn 1

einum sáttmálabundnum riki, um skattainnkrevjing ella fluttning av skatti eins og rentu, rættmálskostnað, sektir og slíkar uppháddir, sum verða álagdar í sambandi við skatting ella innheinting, um asering av gjaldvirði á ti, sum er til innheintingar, so eisini um, hvussu innheintingarpeningsupphæddir skulu verða avroknaðar.

2. Skuldu trupuleikar ella ivamál tikið seg upp millum sáttmálabundnu rikini, tvey ella fleiri, um hvussu hesin sáttmáli eigur at verða mikaður ella nýttur, tá skulu málsráðandi myndugleikar í hesum rikjunum samráðast til tess at loysa spurningin við seriligum semingi. Málsráðandi myndugleikarnir hjá hinum sáttmálabundnu rikjunum skulu sum skjótast verða kunnaðir um úrslitið av slíkum tingingum.

3. Heldur tann málsráðandi myndugleikin í einum sáttmálabundnum riki, at tingingar um tulkingar- og nýtsluspurningar viðvikjandi hesum sáttmála eiga at vera millum málsráðandi myndugleikarnar hjá ollum sáttmála-bundnum rikjunum, skulu slíkar tingingar vera eftir áheitan frá fyrstnevnda rikinum.

4. Um so er at áheitan um hjálparveiting til at heinta inn skatt av inntoku, sum longu er skattað í einum sáttmálabundnum riki enn ti, sum setur fram áheitanina, og ongar reglur eru um, hvussu sleppast kann undan slíkari tviskatting, tá kann málsráðandi myndugleikin í ti riki, sum áheitanina hevur fingið, leita sær sátt við ti myndugleika, sum nátt hevur áheitanina, fyri við sínaámillum avtalu at sleppa undan, at inntokan verður tviskattað. Til slík avtala er gjørd skal bera til at fresta skattakravinum.

Grein 21

Viðvikjandi spurningum, upplýsingum, váttanum og øðrum frásøgnum, sum eitt av sáttmálabundnu ríkjunum fær sambært hesum sáttmála, eru tær reglur galdandi um tøgnskyldu og loynidóm skjala, sum eru í gildi í lóggávunum hjá hesum riki.

Grein 22

Fyri hjálparveiting eftir hesum sáttmála hevur tað sáttmálabundna ríkið, sum hevur biðið um hjálpina, bara skyldu til at endurgjalda kostnaðin, sum er atvoldin í hjálpini, av rættarmáli fyri øðrum dómstóli enn fyrisitingarligum ella við trotabusviðgerð hjá hinum sáttmálabundna ríkinum.

Grein 23

Hesin sáttmáli hevur ikki gildi á Svalbard, Jan Mayen ella øðrum landaoki, sum Noreg hevur uttanfyri Europu.

Grein 24

1. Hesin sáttmáli kemur í gildi triðjandanda dagin eftir tann dag, tá ið øll sáttmálabundnu ríkini hava boðað danska uttanríkismálaráðnum frá, at sáttmálin er góðkendur. Danska uttanríkismálaráðið boðar hinum sáttmálabundnu ríkjunum frá, at tað hevur fingið hesi boð og nær sáttmálin kemur í gildi.

2. Tá ið hesin sáttmáli er komin í gildi, skulu ásetingar hansara verða nýttar viðvikjandi teimum málum, sum eru komin málsraðandi eyndugleika í einum sáttmálabundnum riki, sum áheitanina fær, í hendi eftir gildiskomu sáttmálans.

3. Tann gjørdi sáttmálin millum Danmark, Finnland, Ísland, Noreg og Svøriki frá 9. november 1972 við seinni broytingum um hjálp í skattamálum fer úr gildi og verður nýttur seinastu ferð viðvíkjandi málum, sum eru komin málsraðandi myndugleikanum í tí sáttmálabundna ríkinum, sum hevur fingið ábendingina í hendi, áðrenn hesin sáttmáli kom í gildi.

4. Hesin sáttmáli skerjir ikki og verður ikki skerdur av sáttmála millum donsku ríkisstjórnina og grønlendska landsstýri frá 18. oktober 1979 at sleppa undan tviskatting og heldur ikki av sáttmála, ið er gjørdur sambært punkt 20 í skjali til nevnda sáttmála.

5. Hesin sáttmáli skerjir ikki og verður ikki skerdur av hjálparveitingarreglunum í tviskattasáttmálanum millum donsku ríkisstjórnina og Føroya landsstýri frá 12. august 1986 um at sleppa undan tviskatting.


Grein 25

Eitt sáttmálabundið ríki kann, í seinasta lagi tann 30. juni í einum almanakhaari, uppsiga sáttmálan við at boða hetta skriviliga til tað danska uttanríkisráðið, sum boðar hinum sáttmálabundnu ríkjunum frá tilikari fráboðan og frá innihaldi tess. Um uppsagnartreistin er hildin, heldur sáttmálin uppat at verða galdandi í viðurskiftunum millum tað ríkið, sum hevur sent uppsøgnina og hini sáttmalabundnu ríkini við árslok.

Frumritið av hesum sáttmála verður latið danska uttanríkismálaráðnum í varðveitslu. Danska uttanríkismálaráðið gevur hinum sáttmálabundnu ríkjunum váttað avrit av sáttmálanum.

Til staðfestingar hava undirritaðu við fullgóðari heimild skrivað undir hendan sáttmála.

Skrivað í Keypmannahavn tann 7. desember 1989 í einum eintaki á donskum, føroyskum, grønlendskum, finskum, íslendskum, norskum og svenskum. Tó eru á svenskum gjørdar tvær orðingar ein fyri Finnland og ein fyri Sverriki, allar orðingar hava sama gildi.



Á l i t

1

<u>løgtingsmáli nr. 124/1989: Góðkenning av sáttmála millum Danmark, Føroyar, Grønland, Finland, Ísland, Noreg og Svøriki um hjálp í skattamálum.</u>

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 13. mai 1990 og eftir 1. viðgerð 22. mai beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir eina samd skattanevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

SKATTANEVNDIN, 25. mai 1990.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 125/1989: Broyting í lóg um skrásetingargjald av motorakførum.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í lóg um skrásetingargjald av motorakførum v. m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald á motor-akførum v.m., verður gjørd henda broyting:

§ 12 gongur út, og sum nýggj § 12 verður sett:

"Skrásetingargjaldið verður roknað av cifvirðinum fyri akfarið. Landsstýrið verður heimilað at gera reglur fyri aldri v.m.

lagtingslov om ændring i lov om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 102 af 1. oktober 1986 om registreringsafgift af køretøjer m.v. foretages følgende ændring:

§ 12 udgår, og som ny § 12 indsættes:

"Registreringsafgiften beregnes af cifværdien for køretøjet. Landsstyret bemyndiges at fastsætte regler for alder m.v.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Í viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 9/1986: Skrásetingargjald á akførum, verður m.a. fært fram, at "ein so munandi lækking á tollinum á eykalutum verður mett at føra við sær munandi betri kappingarføri hjá føroysku verkstøðunum mótvegis tælm útlendsku, eins og roknast má við eini øking í verkstaðararbeiðinum."

Henda ætlan er bert partvís gingin út, men samstundis er tað verkstaðararbeiðið, ið stavaði frá "uppbygging" av innflutum skaddum bilum at kalla burturdottið, tí virðisgrundarlagið í sambond við skrásetingina av brúktum bilum varð sett til 90% av virðinum á nýggjum akfari.

Annað úrslit er helst, at brúkt og møguliga skadd føroysk motorakfør nú verða í so nógv "uppbygd" her heima, har reglurnar um "uppbygging" av bilum ikki eru nóg greiðar. Stundum kann ivi stinga seg upp um hugurin at sleppa undan skrásetingargjaldinum ikki hevur avleiðingar fyri tað trygdarliga hjá akførunum.

Fingust reglur um "uppbygging" av motorakførum, hevði tað helst verið til a) fyrimunar fyri føroysku verkstøðini, um virðisgrundarlagið fyri skadd motorakfør, sum verða innflutt, samstundis varð broytt aftur til tað gamla, b) fyrimunar fyri íløguna sum heild í motorakførm, c) fyrimunar fyri trygdina.

Ávirkan.

Verður tikið sum dømi ein bilur, sum hevur eln søluprís upp á góðar kr. 200.000 (fakturaprísur kr. 70.000) og samanliknaður við ein skaddan bil av sama slag, ið kann keypast fyri kr. 30.000, førir lógarbroytingin við sær (sí hjáløgdu útrokning):

Landskassin missir pr. ár	kr. 6.406
Spardur valuta pr. ár	kr. 5.833
Keyparin sparir pr. ár	kr. 9.020

T.v.s. tað, sum landskassin missir, verður umleið spart aftur í valuta, meðan keyparin sparir fitt av peningi.

Grundgevingar.

Grundgevingarnar fyri at broyta lógina eru hesar:

1) At útvega fólki billigari akfør.
2) Kanningar úr Svøríki vísa, at størru bilarnir eru tryggari, t.v.s. uppskotið gevur fólki møguleika at útvega sær tryggari bilar, nú tair kunnu útvegast billigari.
3) Skapt verða arbeiðsplass samstundis, sum spart verður valuta.
4) Uppbygd verður ein vinna (teknologi), sum fær eina uppbyggjandi ávirkan á íðnaðarumhvørvið og skapar eisini fylgiíðnað.

Reglugerðir:

Í sambandi við hesa lógarbroyting skal reglugerð gerast um m.a.

1) Garantiir fyri hesar bilarnar skulu verða tey sum sum fyri nýggjar bilar.
2) § 12 skal bert galda fyri akfør yngri enn 3 ár.
3) Bileftirlitið skal hava eftirlit við, at alt fer regluliga fram.

Á FØROYA LØGTINGI, tann 15. mai 1990

Lasse Klein

A l i t

í

løgtingsmáli nr. 125/1989: Broyting í lóg um skrásetingargjald av motorakførum.

Málið er framlagt av Sjálvstýrisflokkinum tann 18. mai 1990 og eftir 1. viðgerð 22. mai beint á skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen, Jákup Lamhauge og Atli Dam) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Tórbjørn Poulsen) mælir til at samtykkja uppskot Sjálvstýrisfloksins.

SKATTANEVNDIN, 25. mai 1990.

Jógvan við Keldu Jákup Lamhauge Heini O. Heinesen

Atli P. Dam Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

TU. 11080 . Telex 81310 llagns fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. Ieygardag stongt

17. maj 1990

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 1010-20-1

KIH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 126/1989: Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstuðning til ávísar pensiónistar v.fl.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um brenni- og samskiftisstuðning til ávísar pensiónistar v.fl.	lagtingslov om brændsels- og kommunikationstilskud til visse pensionister m.fl.
§ 1. Í fíggjarárinum 1990 verður úr landskassanum veittur eitt brenni- og samskiftisstuðningur til pensiónistar við 1.943 kr. til hvønn pensiónist.	§ 1. I finansåret 1990 ydes af landskassen et brændsels- og kommunikationstilskud til pensionister på 1.943 kr. til hver pensionist.
§ 2. Brenni- og samskiftisstuðningurin verður latin til fólk, ið áðrenn 1. september 1990 hava fingið játtaða fólkapensión, avlamispensión ella einkjupensión ella hava sent inn umsókn um slíka pensión, tí at rætturin til hana er uppnáddur, og seinri fáa pensiónina játtaða.	§ 2. Brændsels- og kommunikationstilskud ydes til personer, som inden den 1. september 1990 har fået bevilget folkpension, invalidepension eller enkepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og senere får pensionen bevilget.

§ 3. Treytin fyri at fáa brenni- og samskiftisstudning er, at pensiónisturin ikki hevur hægri ársinntøku út um pensiónina enn 80.000 kr. fyri hjún og 60.000 kr. fyri støk. Til grund fyri útrokningini verður løgd inntøkan, sum nýtt verður í sambandi við útrokning av pensiónini pr. 1. september 1990. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensiónistar, eiga ein part í felag.

§ 4. Í fíggjarárinum 1990 verður úr landskassanum eisini veittur ein brenni- og samskiftisstudningur við 1.943 kr. til fólk, sum tann 1. september 1990 fáa hjálp sambært § 13 í forsorgarlógini, undir somu treytum sum fyrisett í § 3 í hesi lóg.

§ 5. Brenni- og samskiftisstudningurin verður útgoldin av Føroya Gjaldstovu.
Stk. 2. Annars hevur Almannastovan fyrisitingina av brenni- og samskiftisstudninginum um hendi.
Stk. 3. Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur skjótast

§ 3. Betingelsen for at få brændsels- og kommunikationstilskud er, at pensionisten ikke har højere årsindtægt udover pensionen end 80.000 kr. for ægtepar og 60.000 kr. for enlige. Til grund for beregningen lægges den indtægt, der anvendes i forbindelse med beregning af pensionen pr. 1. september 1990. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsamme en andel.

§ 4. I finansåret 1990 ydes af landskassen også et brændsels- og kommunikationstilskud på 1.943 kr. til personer, der den 1. september 1990 modtager hjælp efter forsorgslovens § 13, på samme betingelser som fastsat i § 3 i denne lov.

§ 5. Brændsels- og kommunikationstilskuddet udbetales af Føroya Gjaldstova.
Stk. 2. Iøvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændsels- og kommunikationstilskuddet.
Stk. 3. Afgørelser, som Almannastovan har truffet, kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

inn fyri landsstýrið.

§ 6. Brenni- og samskiftisstudningurin er ikki skattskyldugur.

§ 6. Brændsels- og kommunikationstilskuddet er ikke skattepligtigt.

§ 7. Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Síðani 1980/81 hevur verið goldin brennistudningur til pensiónistar v.fl. sambært logtingslóg, ið einans hevur havt gildi fyri viðkomandi fíggjarár.

Í 1988 og 1989 var ein stuðul til lutvisa rirdan av samskiftisútreiðslum sum fast telefongjald, sjónvarpsgjald og útvarpsgjald lagdur afturat brennistudninginum og í 1988 og 1989 vóru 2.200 kr. veittar pensiónistum v.fl. í brenni- og samskiftisstudningi.

Á fíggjarlógini 1989 vórðu játtaðar 7.360.000 kr. til brennistudning og á fíggjarlógini 1990 eru játtaðar 6.500.000 kr.

Landsstýrisins uppskot til logtingslóg um brenni- og samskiftisstudning í 1990 er einsljóðandi við lógina fyri 1988 og 1989, tó so at upphæddin lutfaisliga er lækkað til 1.943 kr. samsvarandi lækkaðu játtanini í 1990.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/ Klaus Hermann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 126/1989: Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensjónistar v. m.

Málið er framlagt av landsstýrinum Lanr 18. mai 1990 og eftir 1. viðgerð 22. mai beint í almanna og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Petur Reinert, Jógvan á Lakjuni og Suni Jacobsen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Jákup Lindenskov og Niels Pauli Danielsen) vísir á at útreiðslurnar hjá pensjónistum ikki eru minkaðar, men heldur øktar samstundis sum inntøkuvónirnar eru skerdar.

Minnilutin kann tí ikki taka undir við at minka samskiftisstudningin og harmast um, at samgonguflokkarnir leypa á har garðurin er lægstur.

Minnilutin skjýtur tí upp, at seta av somu upphædd til samskiftisstudning, sum sett varð av í 1989, nevniliga kr. 2.200 fyri hvønn, og setir fram samsvarandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins:

1) Í § 1 verður í staðin fyri "kr. 1.943" sett "kr. 2.200".
2) Í § 4 verður í staðin fyri "kr. 1.943" sett "kr. 2.200".

1) I § 1 ændres "kr. 1.943" til "kr. 2.200".
2) I § 4 ændres "kr. 1.943" til "kr. 2.200".

ALMANNA- OG HEILSUNEVNDIN, 25. mai 1990.

Petur Reinert Jógvan á Lakjuni Suni Jacobsen

Jákup Lindenskov Niels Pauli Danielsen

SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 127/1989: Broyting í studningsvøstrinum.

U p p s k o t

til

___ lógar.

Álagt verður landsstýrinum:

1) at umskipa studningsídøggávuna av fiski soleiðis, at studningurin verður lagdur í søluliðið,
2) at eingin studningur verður latin til fisk, sum fer til ótilvirkaður av landinum,
3) at studningur bert verður latin til fyrsta fløks vøru,
4) at studningur verður latin í mun til tilvirkanina,
5) at so hvørt, sum betri prísur fæst fyri tilvirkaðu vøruna, fellur studningurin burtur ella lutvíst burtur,
6) at seta eina skjóttarbeiðandi nevnd at arbeiða við hesum spurningum, og at leggja málið til viðgerðar á Føroya løgtingi, tá tingið kemur saman á hálvsøku.

Viðmerkingar:

1. partur.

STØÐAN Í FLAKAVINNUNI

Eitt hóttandi arbeiðsloysi, eisini innan flakavinnuna hevur tikið seg upp her á landi. Tey 2.000 til 2.500 fólkini, sum arbeiða í flakavinnuni, hava higartil í ár tingið nógv minni

burtur úr enn undanfarin ár. Hetta hóast nøgdin, sum kemur upp á land, ikki er minkað.

Tað eru ymsar orsøkir til hetta, fyri tað fyrsta er arbeiðsgongdin á virkjunum effektiviserað heilt munandi. Fiskurin er ikki meir enn komin á kaikantin, áður enn fiskurin er arbeiddur undan. Fyri tað næsta tí farið er yvir til at flyta ótilvirkaðan fisk beinleiðis av landinum, umframt føskt, ísað flak í stórum nøgdum.

Hetta hevur longu ført við sær arbeiðsloysi og lønarniðurskurð innan flakavinnuna. Tað er ikki óvanligt at hoyra frá fólkum, sum arbeiða í hesi vinnu, at tey ikki hava vunnið meiri enn millum-kr. 30.000,oo og kr. 35.000,oo higartil í ár.

Henda gongdin kann ikki halda fram, tí sum støðan er loysir tað eg ikki at arbeiða í hesi vinnu, men tað sum ger støðuna uppaftur truplari, er, at hesi fólk ongan annan arbeiðsmøguleika hava.

Neyðugt er tí at seta tiltøk í verk beinanvegin sum føra við sær, at tann peningur, sum tað almenna letur í studningi í størri mun, kemur samfelagnum til góðar.

Tey seinnu árini er støðan vorðin tann, at av náttúrligum orsøkum hevur einki arbeiði verið í flakavinnuni tveir mánaðair av árinum orsakað av ringum veðri. Í nýggja fiskivinnuuppritinum verður lagt upp til, at virkini skulu leggja stilt eitt mánað av sumrinum, og tað er ikki óvanligt soleiðis, sum støðan í dag er, at so hvørt tað líður út á vikuna, t.d. mikudag og hósdag, at arbeiðið gerst minni, og arbeiðsfólkini verða koyrd til hús.

T.v.s. at roknast kann við í framtíðini við einum arbeiðsloysi fyri fólki í flakavinnuni upp til tríggjar og fýra mánaðir á hvørjum ári, um eingi tiltøk verða sett í verk.

Tí er neyðugt bráðfeingis við eini umlegging av studningsviðurskiftunum, sum í størri mun føra við sær at tryggja arbeiði hjá fólki, sum arbeiða í hesi vinnu alt árið.

2. PARTUR

GALDANDI STUDNINGSSKIPAN

Eftir galdandi skipan er einki til hindurs fyri, at fiskur liggur og rotnar á virkinum, enntá veðrur gjørdur til minkaføður ella verður burturbeindur á ósømiligan hátt. Orsøkin er uttan iva tann, at studningurin fellur til gjaldingar tá fiskurin er avreiddur, og tykist hetta at verða stærsta brekið við studningsskipanini, sum hon nú er.

PARTUR AV ARBEIÐSGONGDINI

Soleiðis sum støðan í dag er, verður ein rættiliga stór nøgd av fiskinum, sum kemur upp á land tilvirkaður sum blokkur. Blokkur er og verður ikki annað enn ein råvøra, og hevur sum slík einki við liðugtgjørda veru at gera, og sum uppá seg hevur givið alt ov lítið til samfelagsbúskapin, og fer mest til tað sum verður latið í studningi til hesa vøru av tí almenna.

Orsøkin til tað stóru nøgdina av blokki er tann, at tað er einfalt, lætt og ómaksleyst hjá sølufyritøkunum at selja hesa veru. At henda arbeiðsgongdin gevur minni arbeiði av sær til samfelagið hevur engan týdning havt á teir sum vara av, serstakliga sølufyritøkurnar.

Fyrst og fremst er orsøkin tann, at blokkur verður bólkaður upp í tann partin, sum eitur råvøra, og sum sleppur uttan um tollmúrarnar. Serstakliga gera hesi viðurskifti seg galdandi í sambandi við útflutning til U.S.A. og Bretland. Lidna øran hevur ikki hesar fyrimunir.

Råvøran verður útflutt m.a. til hesi lond, og verður síðani arbeitt umaftur, skorin sundur, tilvirkað og pakkað av nýggjum. Óbeinleiðis hevur føroyski skattgjaldarin á henda hátt goldið fyri arbeiðspláss í øðrum londum, meðan støðið undir fólki í flakavinnuni her á landi verður máað burtur.

Hetta arbeiðið átti sjálvsagt at verði gjørt í Føroyum, á føroyskum virkjum og av føroyskum flakafólki.

3. PARTUR.

NEYÐUGT VIÐ NÝGGJARI SKIPAN

Neyðugt er tí at umskipa alla studningslóggávuna, so allur studningur í framtíðini liggur í søluliðinum, og galdandi má verða, at studningur nært verður latin til fyrsta fløks vøru.

Hørumframt er neyðugt, at studningur verður latin í mun til tilvirkaða vøru, og studningur kann so hækka so hvørt, sum rávøran verður gjørd til liðna vøru.

Treytin fyri at lata studning átti sostatt at verið m.a. tann:

a) Ø studningur til fisk, sum ter ótilvirkaður av landinum.
b) at lata studning í mun til tilvirkanina av fiski.

Tað kann ikki verða nakar ivi um, at hetta nevði tørt við sær, at útflutningsvirðið hevði hækkað munandi eftir stuttari tíð, og at arbeiðið á flakavirkjunum hevði verðið meira støðugt, og fólkið í flakavinnuni hevði veruliga fingið nakað burturúr. Eisini hevði ein slík skipan fært við sær, at bert avmarkaðar nøgdir av fiski høvdu farið av landinum ótilvirkaðar.

Tí verður sett fram hetta uppskot til samtyktar.

Á FØROYA LØGTINGI, tann 18. mai 1990

Lasse Klein

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 127/1989: Broyting í stuðningsmynstrinum.

Málið er framlagt av Sjálvstýrisflokkinum tann 18. mai 1990 og eftir 1. viðgerð tann 22. mai beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Suni Jacobsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Durhuus og Petur Reinert) vísir á uppritið um nýggja fiskivinnupolitikkin. Meirilutin tekur tí ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

Ein minniluti (Henrik Old) vísir á, at málið er stórt og at nógvar ymiskar hugleiðingar tankar eru í málinum sum minnilutin kann taka undir við. Vist verður eisini á, at onnur viðurskifti í uppskotinum eru ógreið, og tí trupul at viðgerða uppá so stutta tíð, men minnilutin tekur undir við, at fiskur, ið ferð ótilvirkaður av landinum, eigur ikki at fáa stuðning. Í 1988 vórðu gjørdar broytingar í løgtingslóg um ráfiskagrunn, nr. 36 frá 20. mai 1988. Í § 1 skt. 1 verður sagt, at fiskavirki eru virki, sum virka fisk til útflutnings. Útfrá hesum heldir minnilutin, at bert virki sum virka fisk koma undir lógina um ráfiskagrunn. Út frá løgtingslóg nr. 36 frá 20. mai 1988 um broyting í løgtingslóg um ráfiskagrunn heldur minnilutin, at heimild er til at steðga stuðningaveitan til fisk sum ferð ótilvirkaður av landinum. Út frá hesi lóg setir minnilutin tí fram soljóðani:

u p p s k o t

til

samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum, út frá løgtingslóg nr. 36 frá 20. mai 1988 um broyting í løgtingslóg um ráðiskagrunn, beinanvegin at staðga veitan av studningi til fisk, sum verð ótilvirkaður av landinum.

Ein annar minniluti (Tórbjørn Poulsen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot sjálv stýrisfloksins.

FISKIVINNUNEVNDIN, 25. mai 1990.

Sverd Aage Ellefsen Suni Jacobsen Jákup Lamhauge

Jógvan Durhuus Petur Reinert Henrik Old

Tórbjørn Poulsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080 . Telex 81310 finans fa . Telefax 14842 . Postbank 64
Vygreiðslutíð: kl. 10—15. Ikke garanteret stoner

18. mai 1990

F. L. j.nr. 1509-17

JM/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 128/1989: Broyting í løgtingslóg um aling av fiski v.m.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um aling av fiski v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 70 frá 9. juni 1988 um aling av fiski v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Loyvi frá landsstýrinum krevst til at byggja, gera til, umskipa, víðka, keypa ella reka støð til alivirksemi. Til alivirksemi uttan alistøð krevst eisini loyvi frá landsstýrinum."

2) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Aliloyvi smb. stk. 1 kann ikki verða givið alibrúk-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om opdræt af fisk m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 70 af 9. juni 1988 om fiskeopdræt m.v. foretages følgende ændringer

1) § 2, stk. 1 affattes således: "Der kræves tilladelse fra landsstyret til at bygge, indrette, omordne, udvide, købe eller drive station til opdrætsvirksomhed. Til opdrætsvirksomhed uden opdrætsstation kræves også tilladelse fra landsstyret."

2) § 2, stk. 2 affattes således:
"Opdrætstilladelse jfr.

um, størra enn 5.000 m^2 ella 25.000 m^3."

3) § 2, stk. 2 verður § 2, stk. 3.

4) § 3, stk. 2, pkt. 4 verður strikað.

5) § 4, stk. 1, pkt. 3 verður strikað.

6) § 4, stk. 1, pkt. 4 verður § 4, stk. 1, pkt. 3.

§ 2.

Henda lóg fer gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

stk. 1 kan ikke gives til opdrætsstationer, større end 5.000 m^2 eller 25.000 m^3."

3) § 2, stk. 2 bliver § 2, stk. 3.

4) § 3, stk. 2, pkt. 4 udgår.

5) § 4, stk. 1, pkt. 3 udgår.

6) § 4, stk. 1, pkt. 4 bliver § 4, stk. 1, pkt. 3.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Figgjarliga støðan hjá alivinnuni er ógvuliga vánalig í løtuni og nógvar av alistøðunum kunnu ikki bera seg, sum støðan er nú.

Fleiri fyrispurningar hava verið frá aðrum um at leggja fleiri alibrúk saman, soleiðis at raksturin verður meiri rationellir, t.d. við at lata teir ymisku árgangirnar ganga hvør sær á ymsum plássum. Hesum forðar alilógin fyri í løtuni, við tað at sami persónur einans kann eiga í tveimum alistøðum.

Ein øking av teimum ymisku loyvunum er heldur ikki møgulig mangastaðni, tí umhvørvið ikki er nóg gott í flestu førum.

Soleiðis er einasti møguleiki fyri at betra um støðuna hjá alivinnuni tann, at lógin verður broytt, soleiðis at fleiri enn

tvey alibrúk hava møguleika at leggja saman, t.v.s. at ein kann eiga í fleiri enn tveimum alibrúkum.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/ Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 128/1989: Broyting í løgtingslóg um aling av fiski v.m.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 18. mai 1990 og eftir 1. viðgerð 22. mai beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og 2 minnilutar.

Meirilutin (Edmund Joensen, Poul Michelsen og Heini O. Heinesen) taka undir við málinum og mæla til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó við teirri broyting at støddmátini sum tilskilaðu eru í § 1, pkt. 2 í uppskoti landsstýrisins "størri enn 5.000 m³ ella 25.000 m³" eiga at verða økt til 6.000 m³ ella 30.000 m³. Hetta er grundað á at nevndin hevur fingið upplýst at onkur alibrúk møguliga eru størri enn tey mát ið verða sett upp í nevndu grein í uppskoti landsstýrisins, og setur tí nevndi meiriluti fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

landsstýrisins

Í § 1, pkt. 2 verður í staðin fyri "5.000 m³ ella 25.000 m³" sett "6.000 m³ ella 30.000 m³	I § 1, pkt. 2 indsættes i stedet for "5.000 m³ eller 25.000 m³" "6.000 m³ eller 30.000 m³"

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) vísir á møguleikarnar, sum alivinnan hevur fyri at gerast ein týdningarmikil partur av høvuðsvinnu okkara og økja munandi um framleiðslu-

og útfluttningsvirði landsins. Hetta gerst m.a. við at møguleikarnir verða kannaðir og troyttir á fiskum, sundum og viðum havi, og við at hitt sama frælsi verður varðveitt innan alivinnuna, sum er galdandi fyri aðrar vinnuhættir. Uppskot landstýrisins og meirilutans bendir tann rætta vegin, og tekur minnilutin tí undir við tí, men loyvir hin sami minniluti sær samstundis at vísa á, at landsstýrið enn ongar útvegir tykist hava fyri at loysa tann figgingartørv, sum í dag hóttir og er hin størsti trupuleiki hjá alivinnuni allari her heima á landi.

Tí verður sett fram soljóðandi

uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin gjøgnum Menningargrunnin ella á annan hátt í samráð við peningastovnarnar at finna fram til eina figging av alivinnuni, sum kann økja um framleiðsluna og útflutningsvirðið.

Minnilutin (Vilhelm Johannesen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin vísir á, at føroyski alipolitikkurin í stóran mun er skipaður eftir norskari fyrimynd, eisini tá talan er um støddir á alibrúkum og ognarviðurskiftini til hesi.

Í Noreg hava teir lagt sera stóran dent á, at eigarar og alarar eru teir somu, og at brúkini hava eina hóskandi stødd, sum samsvarar við tað fyrrnevnda sjónarmiðið, nevniliga at eigarnir sjálvir røkta sín fisk.

Tey fyrstu árini vóru so at siga øll tey norsku loyvini uppá 10.000 rúmetrar. Hetta svarar til 20 vanligar ringar. Teir upprunaligu polarringarnar. Seinni gingu teir upp til 12.500 rúmmetrar ella 25 vanligar ringar.

Her heima eru uppruna loyvini í allar flestu førum givin til 7.500 rúmmetrar ella 15 ringar við tí fyri eyga at hækka loyvini til 10.000 rúmmetrar seinni. At so varð gjørt,

komst eisini av, at nóg mikið av smolti ikki var til taks.

Í viðmerkingunum til landsstýrisuppskotið verður sagt, at fíggjarliga støðan hjá alivinnuni er ógvuliga vánalig í løtuni og at nógvar av alistøðunum ikki kunnu bera seg, sum støðan er nú. Loysnin hjá landsstýrinum er at skipa alivinnuna í størri eindir. At geva loyvi til samanlegging soleiðis at ein alistøð kann verða 25.000 rúmmetrar ella 50 ringar.

Um hetta er loysnin, so skuldi borið til at loyst trupuleikarnar hjá fiskivinnuni við at skift øll tey smáu og miðalstóru fiskiskipini út við stór skip, og trupuleikarnar hjá landbúnaðinum kundu vit loyst við at skipa alla jørðina í nakrar 12 marka garðar. Men so einfalt er tað neyvan.

Í høvuðsheitinum eru tvinnar orsøkir til at fíggjarliga støðan hjá sjógvalarum er vánalig. Onnur orsøkin er tann alt ov høgi smoltprísurin. Hin er tann alt ov høgi kostnaðurin av dráp og hagreiðing. Fram til og við 1980 var pf. Fiskaaling einasti smoltalari her á landi. Tá var smoltprísurin á einum støði sum sjógvalarnir kundu líva við. Men frá 1981 og framoftir vórðu loyvir givin til privatar smoltstøðir og tá reyk smoltprísurin upp í loft.

Í hinum endanum er hagreiðingin av alifiski alt ov kostnaðarmikil. Tað er helst neyðugt at gera eina heildarætlan fyri hvussu farast skal fram í sambandi við dráp og hagreiðing av alifiski. Í nógvum førum hava vit flakavirkir við yvirkapaciteti, ið kunnu taka sær av hagreiðingini, og í øðrum førum er neyðugt at byggja hagreiðingarvirkir.

Í Noreg hevur almenna stýringin av alivinnuni verið so neyv, at har krevst eisini loyvi frá almennum myndugleikum, tá farast skal undir kryvjing og hagreiðing av alifiski. Her heima hevur tilvildin rátt við tí úrslitið at útreiðslurnar eru alt ov stórar.

Í løtuni kann minnilutin ikki taka undir við at broyta lógina um aling av fiski v.m. og setur onki uppskot fram. Hinvegin heldur minnilutin at vit eiga at gera eina heildarætlan fyri hvussu farast skal fram í sambandi við dráp og hagreiðing av alifiski og setur fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at gera heildarætlan fyri hvussu farast skal fram í sambond við dráp og hagreiðing av alifiski og møguliga leggja uppskot fyri tingið um at broyta lógina um aling av fiski v.m. soleiðis at almennir myndugleikar skulu geva loyvi til hagreiðing av alifiski.

ÍDNAÐARNEVNDIN, 25. mai 1990.

Heini O. Heinesen Vilhelm Johannesen John Petersen

Niels Pauli Danielsen Edmund Joensen

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN, FØROYA FRAMBURÐS- IG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 129/1989: Avtøka av løgtingslóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

§ 1.

Løgtingslóg nr. 71 frá 9. juni 1988 um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn við seinni broytingum verður sett úr gildi. Reglur v.m. í sambandi við lóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn verða settar úr gildi.

lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om solidarisk arbejdsmarkedspensionsfond.

§ 1.

Lagtingslov nr. 71 af den 9. juni 1988 om solidarisk arbejdsmarkedspensionsfond med senere ændringer ophæves. Regler m.m. i forbindelse med lov om solidarisk arbejdsmarkedspensionsfond ophæves.

§ 2.

Landsstýrinum verður heimilað at seta nevnd at kanna møguleikar fyri sjálvboðnum eftirlønarskipanum í samráð við partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Landsstyret får hjemmel til at nedsætte udvalg til undersøgelse af mulighederne for private pensionsordninger i samråd med arbejdsmarkedets parter.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Tað var ikki semja í fakfeløgunum og á arbeiðsmarknaðinum, tá ið lógin um samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin varð samtykt á tingi í 1988. Tá varð víst á vansar við lógini sum t.d., fólk koma at gjalda inn í eftirlønargrunnin øll árini og tó einki fáa úr grunninum, um tey fluttu burtur ella doyðu. Hinvegin kunnu tilflytarar, sum einki hava goldið í grunnin, fáa fulla upphædd úr grunninum.

Upprunaliga varð samtykt, at lógin skuldi fáa gildi frá 1. januar 1990, men tað er útsett, tí at lógin kundi ikki umsitast sum var.

Tá ið inntøkulógirnar, ið vóru samtyktar á sumri 1989, tyngja hvørt húsarhald og partarnar á arbeiðsmarknaðinum, so at fólk illa klara eina cykaútreiðslu upp á 2% av løn teirra, sum lógin um samhaldsfasta arbeiðsmarknaðarettirlønargrunnin ásetir, og tá ið so stór ósemja og so stórur ivi er, um lógin kann verða umsitin sum er, mælir Kristiligi Fólkaflokkurin til, at lógin verður avtikin, og at farið verður undir at kanna aðrar møguleikar fyri eftirlønarskipanum í samráð við fakfeløgini og partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Á FØROYA LØGTINGI tann, 18. mai 1990

Niels Pauli Danielsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 129/1989: Avtøka av løgtingslóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Málið er framlagt av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. mai og eftir 1. viðgerð 22. mai beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Karin Kjølbro, Eliesar Arge, Jákup Lamhauge) vísir á, at samgonguflokkarnir hava í samgonguskjalinum felt á blað avtalu um samhaldsfastu arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Tórbjørn Poulsen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein annar minniluti (Vilhelm Johannesen) kann undir ongum umstøðum taka undir við uppskotinum frá Kristiliga fólkaflokkininum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki um at avtaka lógina um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, men heitir inniliga á uppskotsstillararnar um at taka uppskotið aftur, áðrenn tað kemur til atkvøðugreiðslu.

Lógin um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn er ein sera góð, sosial og solidarisk eftirlønarskipan, eitt rættiliga stórt framstig á familjupolitiska økinum og ein góð uppsparingarskipan, sum er einføld, løtt og ódýr at umsita.

Eftir lógini skulu allir løntakarar gjalda ávísan prosent part av lønini inn í grunnin. Somuleiðis skulu allir arbeiðsgevarar - bæði privatir og almennir - gjalda grunninum ávísan prosentpart av tí útgoldnu lønini. T.v.s. at arbeiðsgevararnir gjalda annan helmingin, meðan løntakararnir gjalda hin. Háinntøkurnar gjalda mest. Meðalinntøkurnar gjalda minni, og láginntøkurnar gjalda minst, men í seinna endanum fáa øll eins stóra eftirløn. Tí er lógin um samhaldsfastan arbeiðs-

marknaðareftirlønargrunn eina góð, sosial og solidarisk eftirlønarskipan.

Heldur ikki er nakar ivi um, at hendan skipanin er eitt stórt familjupolitiskt framstig. Mamman, ið arbeiðir heima, ið er um síni børn, fær eins stóran lut í arbeiðsmarknaðareftirlønini, sum øll hini. Hevði vit eina sjálvboðna eftirlønarskipan, skuldi hon annaðhvørt út í arbeiðslívið ella eisini skuldi hon sitið við ongari eftirløn, tá tann aldurin kom. T.v.s. at einsjálvboðin eftirlønarskipan vildi freista mammuna til at farið frá heiminum og børnunum fyri at tryggja sær ellisárini.

Sum uppsparingarskipan kemur samhaldsfasti arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin at roynast væl. Sambært útrokningum, sum vórðu gjørdar av sakkunnleikanum, tá lógaruppskotið varð gjørt, eigur grunnurin umleið 700 mió. kr., tá tey fyrstu 10 árini er liðin. Hesin peningur kann annaðhvørt beinleiðis ella óbeinleiðis lánast út til fløgur í arbeiðsskapandi tiltøk. Við øðrum orðum kann hesin peningur fremja eina størri føroyska eginfígging.

Minnilutin harmast um, at lógin um samhaldstaðan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn ikki fór at virka frá 1. januar 1990, soleiðis sum ætlanin var, men tá hetta ikki lat seg gera, hevur meirilutin her á tingi samtykt, at lógin skal fara at virka frá 1. januar 1991. Minnilutin vónar, at tað verður so, og setir einki uppskot fram í hesum máli, men heitir á kristiliga fólkaflokkin um at taka uppskotið aftur.

ARBEIÐARAMÁLANEVNDIN, 25. mai 1990.

Karin Kjølbro Jákup Lamhauge Eliesar Arge

Vilhelm Johannesen Tórbjørn Poulsen

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN,
FØROYA FRAMBURÐS-OG FISKIVINNUFLOKKUR.

Føroya Løgting

Løgtingsmál nr. 130/1989: Frískúlalóg.

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at fyrireika uppskot til lóg um frískúlar í Føroyum og leggja uppskotið fyri ólavsøkutingið 1990.

Viðmerkingar:

Á nærum hvørjum ári hevur ynski tíkið seg upp her á landi um frískúlar. Vísast kann t.d. á ynski hjá Eftirskúlafelagnum, sum endaði við at fara til Danmarkar við skúla sínum, tí at ynski teirra fekk ongar sømdir frá skúlamyndugleikunum her heima á landi. Eisini aðrir sjálvboðnir felagsskapir hava reist spurningin um frískúla, men hvørja ferð hevur tað verið til fánýtis. Seinast er tað foreldrafelagið "Trivni" suðuri í Vági, ið saman við 8 lærarum hevur vent sær til skúlamyndugleikarnar við ynski um frískúla, men eisini teimum er stuðul sýttur.

Í grannalondum okkara hava teir frískúlar, ið tað almenna stuðlar, og serliga frískúlalóg, sum Kristiligi Fólkaflokkurin heldur tíðina nú vera komna til, at vit her á landi

fara undir at fyrireika og seta í verk, tá ið frískúlarnir í grannlondum okkara hava so stóran týdning. Í Keypmannahavn gongur fjórði hvør næmingur í frískúla, og í øllum Danmark er talan um 20% av næmingunum, sum fáa undir vísing í frískúlum.

Á FØROYA LØGTINGI tann. 18. mai 1990

Niels Pauli Danielsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 130/1989: Frískúlalóg.

Málið er framlagt av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 18. mai 1990 og eftir 1. viðgerð 22. mai beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Eilif Samuelsen, Hergeir Nielsen og Jógvan Adolf Johannessen) tekur ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram. Nevndi meiriluti vísir á, at sambært løgtingslóg nr. 21 frá 22. mars 1979 er heimild at seta á stovn frískúlar og privatar skúlar, har serligur tørvur er.

Minnilutin (Jógvan á Lakjuni) vísir til fólkafloksins prinsipiellu støðu til frískúlar og privatskúlar og til lógaruppskot, sum flokkurin áður hevur lagt fram um sama mál, og er prinsipielt fyri uppskotinum hjá Kristiliga Fólkaflokkinum. Minnilutin mælir til, at málið verður beint í landsstýrið.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur støðu í tingsalinum.

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 25. mai 1990.

Eilif Samuelsen Hergeir Nielsen Jógvan á Lakjuni

Jógvan Adolf Johannessen Lasse Klein

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN, FØROYA F. , URÐS- OG FISKIVINNUFLOKKUR

Føroya Løgting

Løgtingsmál nr. 111/1989: Ferðir til orlov í sambandi við barnsburð.

U p p s k o t

um

samsvar

Alagt verður landsstýrinum í Ólavsøkutingsetuni at koma við uppskoti um løgtingslóg, ið tryggjar foreldrum rætt til orlov í sambandi við barnsburð.

Viðmerkingar:

Løgtingslóg um dagpening í sambandi við barnsburð varð samtykt á tingi, meðan landsstýrissamgongan 1985-1988 sat í Tinganesi, og Kristiligi fólkaflokkurin hevði familju- og almannamál í hondum. Henda lóg ... r kvinnum, ið eiga rætt til fulla dagpeningaupphædd ...ar, um ...r fara ikki aftur til arbeiðis teir fyrstu 6 ...arnar eftir barnsburðin.

Tíverri sigst frá, at ...lar kvinnur fáa ikki ...ri frá sínum arbeiði nevndu 6 mánaðirnar. Tí verður heitt á landsstýrið at bera so í bandi, at hesin rættur er tryggjaður ...llum kvinnum við lóg í samsvar við ta til eina og hvørja tíð galdandi dagpeningalóg.

Á FØROYA LØGTINGI tann, 18. mai 1990

• Niels Pauli Danielsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080 . Telex 81310 logms fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15 leygardag stongt

21. mai 1990

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 2111-12

IC/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 132/1989: Løgtingslóg um maskinskúlaútbúgvingar.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um maskinskúlaútbúgvingar.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at reka skúla til fremjing av teimum í § 3 nevndu útbúgvingum.

§ 2. Landsstýrið setir útbúgvingarráð á hesum skúla og ger reglugerð fyri virki tess.

§ 3. Á maskinskúla kann fyrireiking fara fram til hesi prógv:

1) Dugnaskaparprógv í motorpassing,
2) motorpassaraprógv,
3) maskinistprógv,
4) maskinmeistaraprógv,
5) el-installatørprógv og sterkstreymsteknikaraprógv.

Lagtingslov om maskinskoleuddannelser.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at drive skole til gennemførelse af de uddannelser, der er nævnt i § 3.

§ 2. Landsstyret nedsætter et uddannelsesråd på denne skole og fastsætter en vedtægt for dets virksomhed.

§ 3. På maskinskole kan forberedes til følgende eksaminer:

1) Dueligheds bevis i motorpasning,
2) motorpassereksamen,
3) maskinisteksamen,
4) maskinmestereksamen,
5) el-installatøreksamen og stærkstromsteknikeroksamen.

Stk. 2. Efteruddannelse i de

Stk. 2. Eftirútbúgving í teimum í stk. 1 nevndu útbúgvingum og royndarútbúgvingar kunnu eisini fara fram á maskinskúla.

Stk. 3. Fyrireiking og prógvtøka til dugnaskaparprógv í motorpassing og motorpassaraprógv eins og eftirútbúgving sambært stk. 2 kunnu eisini fara fram á øðrum skeiðum eftir góðkenning frá Landsskúlafyrisitingini.

§ 4. Tær í § 3, stk. 1 nevndu útbúgvingar fevna heilt ella partvist um hesar lærugreinir:
arbeiðsleiðsla, heruppií trygd á sjógvi og landi,
eldsløkking,
heilsulæra,
sjórættur,
føroyskt,
danskt,
enskt,
týskt,
rokning og støddfrøði,
alisfrøði,
evnafrøði,
maskinlæra,
elektrotøkni,
elektronikkur,
automatión og datamatikkur,
virkisbúskapur og bókhald,
kølitøkni,
hydraulikkur.

Stk. 2. Um gongdin ger tað

uddannelser, der er nævnt i stk. 1, og forsøgsuddannelser kan også finde sted på maskinskole.

Stk. 3. Forberedelse og eksamen til dueligheds bevis i motorpasning og motorpassereksamen såvel som efteruddannelse iflg. stk. 2 kan også finde sted på andre kursus efter godkendelse fra undervisningsdirektoratet.

§ 4. De uddannelser, der er nævnt i § 3, stk. 1 omfatter helt eller delvis følgende fag:
arbejdsledelse, herunder sikkerhed til lands og til vands,
brandbekæmpelse,
sundhedslære,
søret,
færøsk,
dansk,
engelsk,
tysk,
regning og matematik,
fysik,
kemi,
maskinlære,
elektroteknik,
elektronik,
automation og datamatik,
virksomhedsøkonomi og bogholderi,
køleteknik,

neyðugt, kann landsstýrið áseta, at undirvising eisini skal fevna um aðrar lærugreinir, ella at onkrar falla burtur.

Stk. 3. Næmingarnir skulu fáa ein part av undirvisingini sum venjingarsigling og við simulatori.

§ 5. Landsskúlastjórin skipar fyri prógvtøkuni.

Stk. 2. Til prógvtøkuna verða havdar skrivligar og munnligar royndir við prógvdómarum, sum landsskúlastjórin útnevnir. Prógvdómarar í maskin- og el-læru skulu hava hægsta maskinmeistaraprógv ella samsvarandi prógv.

Stk. 3. Landsskúlastjórin gevur teimum, ið staðið hava prógvtøkuna, prógvbræv.

§ 6. Landsstýrið ásetur nærri reglur um:

a) treytir fyri upptøku á maskinskúla,
b) undirvísingarskipan, lærukrøv og lærugreinir,
c) prógvtøkuhald, herundir krøv til tær einstøku prógvtøkurnar, prógvtalageving og prógvdøming.

hydraulik.

Stk. 2. Såfremt udviklingen nødvendiggør det, kan landsstyret bestemme, at undervisning også skal omfatte andre fag, eller at nogle bortfalder.

Stk. 3. Eleverne skal have en del af undervisningen som øvelsessejlads og med simulator.

§ 5. Undervisningsdirektøren forestår eksamen.

Stk. 2. Ved eksamen afholdes skriftlige og mundtlige prøver med censorer, som undervisningsdirektøren udpeger. Censorer i maskin- og el-fag skal have højeste maskinmestereksamen eller tilsvarende eksamen.

Stk. 3. Undervisningsdirektøren udsteder eksamensbevis til dem, der har bestået eksamen.

§ 6. Landsstyret fastsætter nærmere regler om:

a) betingelser for optagelse på maskinskole,
b) undervisningens tilrettelæggelse, pensumkrav og fag,
c) eksamenernes afholdelse, herunder krav til de enkelte eksaminer, karaktergivning og censur.

§ 7. Maskinskúlin skal tryggja næmingar móti óhappi undir venjingarsigling og bjargingarroynd og á eldsløkkiskeiði.	§ 7. Maskinskolen skal forsikre eleverne mod ulykker under øvelsessejlads og redningsforsøg og på brandbekæmpelseskursus.
§ 8. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 1990.	§ 8. Denne lagtingslov træder i kraft 1. august 1990.

Viðmerkingar:

Á sumri 1988 varð nevnd vald, ið fekk sum arbeiðssetning at fyrireika løgtingslóg um maskinmeistaraútbúgving.

Ein av orsøkunum til at landsstýrið vildi hava nýggja maskinmeistaralóggávu var, at løgtingið hetta sama ár hevði samtykt nýggjar lógir um sjóvinnu og manning á skipum. Hetta bar í sær, at neyðugt var at gera broytingar í galdandi maskinmeistaralóg.

Løgtingslógirnar vóru ávikavist nr. 16 frá 3. mars 1988 og nr. 5 frá 15. januar 1988, ið vórðu lýstar at galda í Føroyum og sum m.a. staðfesta altjóða sáttmálan STCW frá 1978 um útbúgving, vinnubrøv og vaktarhald á sjónum.

Við hesi nýggju lóg verða øll tey krøv, ið altjóða sáttmálin STCW ásetir, lokin.

Onnur orsøkin var at fáa gjørt lógir, ið eru betur hóskandi til okkara samfelag.

Maskinmeistaraútbúgvingin fer í dag fram sambært lóg nr. 197 frá 24. mai 1972 "om uddannelse af maskinister og maskinmestre", hóast henda lóg ongantíð er sett í gildi í Føroyum. Henda lóg er sett úr gildi í Danmark, og danir hava fingið nýggja lóg, ið varð kunngjørd 1. juli 1988. Heldur ikki henda lóg er galdandi fyrí Føroyar.

Landsstýrið heldur, at í Føroyum er tørvur á hesum útbúgvingum:

1) Dugnaskaparútbúgving.
2) Motorpassaraútbúgving.
3) Maskinistútbúgving.
4) Maskinmeistaraútbúgving (3 ár).
5) El- installatørútbúgving og sterkstreymstekningaraútbúgving.

Uppskot landsstýrisins ber í sær, at vit fáa greiðari reglur fyri sjálvari útbúgvingini, samstundis sum altjóða krøvini, ið sett verða, verða lokin.

Í § 6 í uppskotinum verður sagt, at landsstýrið setir nærri reglur um útbúgvingarnar.

Ætlanin er, at dugnaskaparútbúgvingin fer fram sum kvøldundirvísing. Samlaða tímatal verður 150, ið gevur rætt til at passa upp til 450 KW motormegi.

Motorpassaraútbúgvingin tekur 5 mánaðir, og henda prógvtøka gevur loyvi til at passa upp til 750 KW motormegi.

Maskinistútbúgvingin tekur 12 mánaðir ÷ eykaskeið. Maskinistprógvið loyvir at passa motorar upp til 3000 KW motormegi.

Maskinmeistaraútbúgvingin tekur 3 ár og gevur somu rættindi sum víðkaða maskinmeistaraútbúgvingin.

Á landi hevur tekniska menningin verið ógvuliga stór, harvið verða størri krøv sett til tey, ið starvast á hesum øki. Tí verður hildið neyðugt, at skipa so fyri, at tíðarhóskandi el-installatørútbúgving og sterkstreymsteknikaraútbúgving verða veittar.

Ætlan landsstýrisins er, at henda lóg skal koma í gildi 1. august í ár, soleiðis at tá ið skúlin byrjar eftir summarfrítíðina, verður farið fram eftir hesi nýggju lóg.

Til § 2:

Ætlanin er, at útbúgvingarráðið skal hava 5 limir og verða soleiðis samansett, at eitt umboð verður fyri maskinmeistarar á landi, eitt umboð fyri maskinmeistarar á sjónum, eitt umboð fyri el-installatørar, eitt umboð fyri Motorpassarafelagið og eitt umboð fyri Reiðarafelagið. Skrivari hjá útbúgvingarráðnum verður settur av landsskúlastjóranum.

Til § 4, stk. 3:

Ætlanin er at tað samstarv um venjingarsigling, sum í dag er við Vaktar- og Bjargingartænastuna, heldur fram, ella at aðrir útvegir verða funnir.

Endamálið við simulatorvenjing er at gera næmingarnar betri førar fyri at fara umborð á skip og samstundis skapa møguleikar fyri at lúka siglingarkrøvini til vinnubrævið. Maskinrúmsimulator er tøkur á Føroya Maskinskúla og er ogn landsstýrisins.

Til § 5:

§ 5 er ein nýskipan, soleiðis at tað nú er landsskúlastjórin, sum skipar fyri prógvtøkuni, og er hetta í samsvari við reglugerðina fyri landsskúlastjóran nr. 3 frá 2. januar 1980 § 2, stk. 2. Landsskúlastjórin er tó í fyriskipanini av prógvtøkuni bundin av ásetingini í § 5, stk. 2.

Til § 6:

Ætlanin er, at teir næmingar, sum ikki hava tann neyðuga skúlakunnleika, skulu hava møguleika fyri at taka eitt fyrireikingarskeið, soleiðis at teir lúka upptøkukrøvini.

Signar Hansen
landsstýrismaður

/ Jákup Thorsteinsson

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 132/1989: Løgtingslóg um maskinskúlaútbúgvingar.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 25. mai 1990 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, men við tað, at málið er so umfatandi, mælir ein samd nevnd tinginum til, at mentannar- og skúlanevndin hesum máli viðvíkjandi verður gjørd til millumtinganevnd. Samsvarandi hesum setir nevndin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Mentannar- og skúlanevndin verður gjørd til millumtinganevnd hesum máli viðvíkjandi.

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 9. X 1990.

Lasse Klein Jógvan A. Johannesen Hergeir Nielsen

Jógvan á Lakjuni Eilif Samuelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-/.v Førshavn, 17. juli 1990

F. L. nr.
at tilskrifta verður.

FR. 11030 Telex 81310 lmons fa. Sýtefax 14943. Postbøks 64
Vegrenslustað: kl. 10—15, Innargarmur sjónleikarhúsið

JøH/pp

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 134/1989: Løgtingslóg um keyp av fiski frá útlondum til virkingar.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um keyp av fiski frá útlondum til virkingar.

§ 1. Heimilað verður landsstýrinum í fíggjarárinum 1990 at veita 1 kr./kg í stuðli til keyp av fiski uttanlands til virkingar - jbr. § 2 í løgtingslóg um prisiskoyti til ráfisk - í Føroyum, tó í mesta lagi upp til 5 mió. kr.
Stk. 2. Í hesi lóg eru fiskasløgini, sum koma undir skipanina, tey somu, sum nevnd eru í løgtingslóg um ráfiskabýti millum fiskavirki, eins og vektin av ráfiski verður roknað á sama hátt sum eftir nevndu lóg.

§ 2. Henda lóg fær gildi

Lagtingslov om køb af fisk i udlandet til produktion.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til i finansåret 1990 at yde 1 kr/kg i støtte til køb af fisk fra udlandet til produktion - jfr. § 2 i lagtingslov om pristilskud til råfisk - på Færøerne, dog ikke for mere end 5 mio. kr.
Stk. 2. I denne lov er fiskearterne, som omfattes af ordningen, de samme, som nævnt i lagtingslov om råfiskfordeling mellem fiskevirksomheder, ligesom vægten af råfisk bliver regnet på samme måde som efter nævnte lov.

§ 2. Denne lov træder i kraft

dagin eftir, at hon er lýst. Tó er landsstýrinum heimilað at veita sama studning til fisk, sum er keyptur í árinum 1990.

dagen efter dens bekendtgørelse. Dog er landsstyret bemyndiget til at yde tilsvarende støtte til fisk, der er købt i året 1990.

Viðmerkingar:

Tað er ikki vanligt í dag at virki keypa fisk frá útlondum til virkingar. Møguleikar kunnu verða fyri hjá føroyskum virkjum at keypa fisk aðrastaðni.

Fyri at gera møguleikarnar betri fyri at gera royndir á hesum øki, leggur landsstýrið hetta uppskot fyri tingið um, at landskassin rindar 1 kr./kg fyri fisk til virkingar í Føroyum, keyptur úr øðrum londum.

Hesin fiskur kemur ikki upp í rávorubýtið.

Møguleiki er fyri, at talan kann verða bæði um frystan og feskan fisk.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/Kjartan Hoydal

løgtingsmáli nr. 134/1989: Løgtingslóg um keyp av fiski frá útlendum til virkingar.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 17. juli 1990 og eftir 1. viðgerð 19. juli beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 20. juli og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meiriluti (Svend Aage Ellefsen, Sune Jacobsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Durhuus, Finnbogi Ísakson og Henrik Old) tekur undir við

Ein minniluti (Ernst Kass) førir fram, at neyðugt er at vera sera varin, tá talan er um at lata almennan studning til keyp av fiski frá útlendum til virkingar í Føroyum.

Ein slíkur studningur kann føra við sær, tá støða okkara verður almannakunnug, at ávís lond, sum vit hava góða samvinnu við á fiskivinnuøkinum, kunnu nokta fyri ávísum sømdum, um so er, at almennur stuðul verður latin, og hetta ger, at fiskurin í staðin fyri verður avreiddur í Føroyum heldur enn í heimlandinum.

Fyrst og fremst verður hugsað um samvinnuna við íslendingar, ið kunnu føla seg tirtnar um, at vit í Føroyum kunnu bjóða íslendingum betri prís fyri fiskin, orsakað av almennum studningi.

Henda støða kann føra við sær, at góða samvinna okkara við íslendingar kemur í vanda, og at teir krevja skipanina burturbeinda, áðrenn nýggjar samráðingar fara fram um kvotur í Íslandi. Sama støða kann eisini koma at gera seg galdandi við onnur lond.

Minniluti heldur, at tað er neyðugt at vísa á henda vandan, men tekur annars undir við uppskotinum.

Ein annar minniluti (Henrik Old) tekur undir við

uppskoti landsstýrisins, men er av teirri áskoðan, at tað bert eigur av vera fyrsta floks fiskur, sum verður keyptur, tí eigur at verða sett í § 1, 1. stk. eftir orðini: "til keyp av": "fyrsta floks".

Samsvarandi hesum setir minnilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, 1. stk. verður eftir orðini "til keyp av" sett: "fyrsta floks".	I § 1, stk. 1 indsættes efter ordene "til køb af": "af første sortering".

FISKIVINNUNEVNDIN, 23. juli 1990.

Svend Aage Ellefsen Sune Jacobsen Jákup Lamhauge

Jógvan Durhuus Finnbogi Ísakson Henrik Old

Ernst Kass

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 17. juli 1990

Tlf. 11030 . Telex 81110 lingmt fa . Telefax 14942 . Postboks nr.
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

F. L. j. nr.
Tað eftirfarandi á grein

KjK/pp

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 235/1989: Løgtingslóg um prísiskoyti til ráfisk.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um prísiskoyti til ráfisk.	lagtingslov om pristilskud til råfisk.
§ 1. Heimilað verður einum meiriluta av samlaða limatalinum í landsstýrinum við góðkenning av einum meiriluta av samlaðu limatalinum í Fiskivinnunevnd Løgtingsins at veita manningini á og eigara av føroyskum fiskifari prísiskoyti pr. kg. fyri tann ráfisk, fiskifarið hevur veitt og avreiðir til føroyskt fiskavirki til virkingar.	**§ 1.** Ved denne lov bemyndiges et flertal af det samlede medlemsantal i landsstyret med godkendelse af et flertal af det samlede medlemsantal i lagtingets fiskeriudvalg at yde mandskaber på og ejere af færøsk fiskerifartøj pristilskud pr. kg. for den råfisk fiskefartøjet har fanget og indhandler til færøsk fiskevirksomhed til produktion.
Stk. 2. Prísiskoyti verður eisini latið fyri fisk, sum verður seldur á uppboðssølu treytað av, at fiskurin verður keyptur fyri í minsta lagi tann minstapris, sum er	**Stk. 2.** Pristilskud ydes også for fisk, som sælges på auktion betinget af, at fisken bliver købt for mindst den minimumspris, som er fastsat jfr. lagtingslov om minimumspris på råfisk.

ásettur samb. løgtingslóg um minstaprísir á ráfiski.

Stk. 3. Prísískoyti verður býtt millum manning og eigara í lutfallinum, sum býtt annars verður eftir galdandi sáttmálum millum manning og eigara.

§ 2. Í hesi lóg

a. er virkaður feskur fiskur, tann fiskur sum er meira viðgjørdur enn blóðgaður, kruvdur, sløgdur, avhøvdaður, umskipaður, skildur ella lagdur í onnur íløt. Hesi krøv eru minstukrov.

b. eru fiskasløgini, sum koma undir skipanina, tey somu, sum nevnd eru í løgtingslóg um ráfiskabýti millum fiskavirki eins og vektin av ráfiski verður roknað á sama hátt sum eftir nevndu lóg.

§ 3. Í avrokningini avroknar ráfiskakeypari samstundis prísískoytið til seljaran. Ráfiskakeypari ger upp til Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna tann 1. og 15. í hvørjum mánaði tað prísískoyti, hann hevur goldið; grunnurin endurrindar honum prísískoytið.

Stk. 2. Verður ráfiskur útfluttur óvirkaður jbr. § 2 a.

Stk. 3. Pristilskudder bliver fordelt mellem mandskab og ejer i samme forhold som anvendes mellem mandskab og ejer efter gældende overenskomst.

§ 2. I denne lov

a. er forarbejdet fersk fisk at forstå som fisk, der er mere forarbejdet end strubeskåret, opskåret, tenset, hovedkappet, omskibet, sorteret eller ombragt i andre kasser. Dette er mindstekrav.

b. er fiskearterne, som omfattes af ordningen, de samme som nævnt i lagtingslov om råfiskefordeling ligesom vægtaf af råfisk bliver regnet på samme måde som efter nævnte lov.

§ 3. Ved afregningen afregner råfiskekøberen samtidig pristilskudet til sælgeren. Råfiskekøberen opgør til Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna hver den 1. og 15. i hver måned det pristilskud, som denne har betalt; fonden refunderer denne pristilskudet.

Stk. 2. Bliver råfisken eksporteret uforarbejdet jfr. §

verður ein uppnædd svarandi til eitt roknað prísískoyti til henda fisk at mótrokna eina ferð um fjórðingsárið.

Stk. 3. Landsstýrinum verður heimilað at gera gjøllari reglur fyri avrokning og endurrinding av prísískoyti til keypara.

§ 4. Fyri tíðarskeiðini 6 mánaðir fram frá hvørjum 1. oktober og 1. apríl, verða prísískoytini at áseta og at lýsa av landsstýrinum í Útvarpi Føroya og teimum føroysku dagbløðunum 10 dagar áðrenn tíðarskeiðið byrjar.

§ 5. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna fyrisitir prísískoytisskipanini.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi 1. september 1990.

Stk. 2. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 31 frá 29. mai 1985 um studning til fiskivinnuna, sum hon er broytt við løgtingslógunum nr. 58 frá 14. mai 1986 og nr. 62 frá 14. mai 1987.

2 a. modregnes et beløb svarende til et udregnet pristilskud til denne fisk en gang hvert kvartal.

Stk. 3. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere regler for afregning og refusion af pristilskud til køber.

§ 4. Pristilskudet fastsættes for en periode på 6 måneder hver den 1. oktober og 1. april og bekendtgøres i Útvarp Føroya og i de færøske aviser 10 dage forinden periodens start.

§ 5. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna administrerer pristilskudsordningen.

§ 6. Denne lov træder i kraft 1. september 1990.

Stk. 2. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 31 af 29. mai 1985 om støtte til fiskerierhvervet, som ændret ved lagtingslov nr. 58 af 14. mai 1986 og nr. 62 af 14. mai 1987.

Viðmerkingar.

Ætlanin er, at greiður skilnaður skal vera millum tann prís, sum

verður latin fyri ráfisk í Føroyum, og tann studning, sum verður veittur úr landskassanum.

Eftir hesum uppskoti kann prísískoyti latast fyri ráfisk, sum føroysk fiskifør avreiða til virkingar í Føroyum. Í lógini verður skrásett, hvat skilst við virkaðan fisk. Hetta merkir, at um virki ella onkur annar flytur út fisk, sum ikki er virkaður, verður prísískoytið kravt innaftur.

Nevnd eru í lógini, hvørji fiskaslóg kunnu fáa prísískoyti.

Hereftir skulu landsstýrið og løgtingsins fiskivinnunevnd áseta prísískoytið. Tað skal ásetast fyri eitt hálvt ár í senn og kemur í gildi hvønn 1. apríl og 1. oktober. Minstiprísur á ráfiski kemur harafturímóti í gildi tann 1. í hvørjum mánaði.

Frá 1. januar 1991 fáa fiskifør, sum avreiða ráfisk í Føroyum, bert prísískoyti sum studning, smb. uppskot um rakstrar- og manningarstudning.

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður

/KjartarHoydal

Á l i t

í

<u>løgtingsmáli nr. 135/1989: Løgtingslóg um prísískoyti til ráfisk</u>.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 17.juli 1990 og eftir 1. viðgerð 19. juli beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. juli 1990 og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Suni Jacobsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Durhuus og Finnbogi Ísakson) tekur undir við málinum, men vísir á, at Skipara- og Navigatørfelagið á fundi við nevndina gjørdi vart við, at skipari á fiskifari sambært galdandi lóg ikki kann definerast sum partur av manningini, og tí mælti til, at orðalagið í fyriliggjandi uppskotinum varð broytt.

Eisini varð undir viðgerðini frá aðrari síðu gjørt vart við, at orðaljóðið í § 1, stk. 3 kundi kennast í so bindandi og ósmidligt. Meirilutin heldur tað tí vera skilagott at loysa nakað upp, og mælir tí til at gera ískoyti í stk. 3.

Meirilutin vísir annars til viðmerkingar sínar í álitinum til løgtingsmál nr. 138/1989 og setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til uppskot landsstýrisins

1) Í § 1, pkt. 1 verður orðingin "manningin" broytt til "skipara, manning".
2) § 1, stk. 3 verður orðað soleiðis:

1) I § 1 ændres "mandskabet" til "skipper, mandskab".
2) § 1 stk. 3 formuleres således:
"Pristilskuddet fordeles

. . .

Prísskoyti verður býtt millum skipara, manning og eigara í lutfallinum, sum býtt annars verður eftir galdandi sáttmálum millum manning og eigara, um ikki partarnir koma ásamt um annað".

3) § 6 verður soljóðandi:
"Tann, sum ger brot á reglurnar eftir hesi løgtingslóg, kemur undir bót, um ikki harðari revsing er uppiborin".

4) § 6 verður § 7.

mellem skipper, mandskab og ejer i samme forhold som anvendes mellem mandskab og ejer efter gældende overenskomst, såfremt parterne ikke er enige om en anden fordeling".

3) § 6 formuleres således:
"Medmindre strængere straf er forskyldt, straffes med bøde den er ikke overholder reglerne i denne lagtingslov".

4) § 6 bliver § 7.

Ein annar minniluti (Ernst Kass) mælir tinginum frá at samtykkja uppskot landsstýrisins. Víst verður annars til viðmerkingarnar í álitinum til løgtingsmál nr. 139/1989: Ráfiskabýti millum fiskavirkini.

FISKIVINNUNEVNDIN, 23. juli 1990.

Svend Aage Ellefsen — Suni Jacobsen — Jákup Lamhauge

Jógvan Durhuus — Finnbogi Ísakson — Henrik Old

Ernst Kass

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Ein minniluti í fiskivinnunevndini (Henrik Old) heldur tað ikki vera heppi, at landsstýrið saman við fiskivinnunevndini heroftir skal áseta prísískoyti, tí hetta kann verða trupult, serliga kann verða trupult at fáa meiriluta í fiskivinnunevndini fyri ásetan av prísiskoyti. Tí skjýtur minnilutin upp, at studningsnevndin verður varðveitt.

Eftir uppskotinum frá landsstýrinum verður bert veitt prísískoyti til ráfisk, landaður til føroysk fiskavirkir til virkingar.

Sostatt fellur burtur prísískoyti til t.d. saltfiskalínuskip, svartkalva frystilínuskip, nótaskip, framleiðslu av svartkjøtti við verksmiðjutrolara, og kann hetta ikki vera meiningin, tí so fara onkrar av hesum veiðunum heilt at steðga.

Minnilutin setir samsvarandi omanfyristandandi fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

1) Í § 1, 1. stk., 1. punktum ganga út orðini: "einum meiriluta av samlaða limatalinum í landsstýrinum við góðkenning av einum meiriluta av samlaða limatalinum í Fiskivinnunevnd Løgtingsins" og í staðin

1) I § 1, stk. 1, 1. punktum udgår følgende: "et flertal af det samlede medlemsantal i landsstyret med godkendelse af et flertal af det samlede medlemsantal i lagtingets fiskeriudvalg" og i stedet indsættes:

verður sett: "stúdnings nevndini".

2) Í § 1 verður sum nýtt 3. stk. sett:
"Heimilað verður eisini at veita stúdning til aðrar veiðuhættir."
Stk. 3 verður stk. 4.

3) Í § 6 verður stk. 2 strikað.

"stipendieudvalg".

2) Til § 1 indsættes som nyt stk. 3:
"Der bemyndiges også at yde støtte til andre fiskerimåder." Stk. 3 bliver stk. 4.

3) I § 6 udgår stk. 2.

Á FØROYA LØGTINGI, 25. juli 1990.

Henrik Old

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11080 . Telex 81310 tlagms fa . Telefax 14941 . Postbox bd
Avgreiðslutíð: kl. 10—15. leygardag stongt

17. juli 1990

F. L. j. nr.
(at tiskilja i svari)

KjH/pp

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 136/1989: Løgtingslóg um eyka rakstrar- og manningarstudning.

U p s k o t

til

løgtingslóg um eyka rakstrar- og manningarstudning.

§ 1. Heimilað verður einum meiriluta av samlaða límatalinum í landsstýrinum við góðkenning av einum meiriluta av samlaða límatalinum í Fiskivinnunevnd Løgtingsins at veita manningini á og eigara av føroyskum fiskifari ein studning pr. kg. fyri tann ráfisk fiskifarið hevur veitt og avreiðir - eisini á uppboðssølu treytað av, at fiskurin verður keyptur fyri í minsta lagi tann minstaprís, sum er ásettur samb. løgtingslóg um minstaprísir á ráfiski - til føroyskt fiskavirki.

lagtingslov om ekstra drifts- og mandskabsstøtte.

§ 1. Ved denne lov bemyndiges et flertal af det samlede medlemsantal i landsstyret med godkendelse af et flertal af det samlede medlemsantal i lagtingets fiskeriudvalg at yde mandskab på og ejere af færøsk fiskefartøj støtte pr. kg. for den råfisk fiskefartøjet har fanget og indhandler - også på auktion betinget af at fisken købes for mindst den minimumspris, som er fastsat jfr. lagtingslov om minimumspriser på råfisk til færøsk fiskevirksomhed.

§ 2. Fiskasløgini, sum koma undir skipanina, eru tey somu, sum nevnd eru í løgtingslóg um ráfiskabýti millum fiskavirkini eins og vektin av ráfiski verður roknað á sama hátt sum eftir nevndu lóg.

§ 3. Landsstýrinum verður heimilað at gera gjøllari reglur til fremjing av lógini.

§ 4. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna fyrisitur studningsskipanini.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi 1. september 1990, og fer úr gildi 1. januar 1991.

§ 2. Fiskearterne, som omfattes af ordningen er de samme, som er nævnt i lagtingslov om råfiskefordeling mellem fiskevirksomhederne ligesom vægten af råfisken regnes på samme måde som efter nævnte lov.

§ 3. Landsstyret bemyndiges til at udforme nærmere regler for lovens gennemførelse.

§ 4. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna administrerer støtteordningen.

§ 5. Denne lov træder i kraft 1. september 1990, og ophæves 1. januar 1991.

Viðmerkingar:

Uppskotið er ein skiftislóg, sum heimilar landsstýrinum og løgtingsins fiskivinnunevnd at lata føroyskum fiskiførum rakstrar- og/ella manningarstudning.

Ein partur av umleggingini av studningsskipanini er, at prísískoyti skal vera einasti studningur, sum verður latin manning og eigarum av fiskiførum úr landskassanum. Prísískoytið skal eins og avreiðingarprísurin býtast millum skip og manning eftir sáttmálum millum partarnar.

Ymisk viðurskifti gera, at ein slík broyting tekur tíð at seta í verk. T.d. eru ymiskir sáttmálar galdandi fyri ymiskar

veiðuhættir, og umleggingin kann broyta lutfallið millum partin hjá manningini og reiðaranum.

Tað verður tí neyðugt at geva vinnuni høvi til at umhugsa avleiðingarnar og møguliga viðgera tær í sáttmálasamráðingum.

Lógin skal tí tryggja, at tað lutfall, sum hevur verið frammanundan, verður varðveitt árið út, til avleiðingarnar av umleggingini eru tiknar við í sáttmálunum.

Rakstrar- og/ella manningarstuðningur skal í hesum tíðarskeiði bert veitast í tann mun, tað er neyðugt sum ískoyti til prísiskoytið, meðan umleggingin verður framd.

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður

/Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 136/1989: Løgtingslóg um evka rakstrar- og manningarstuðning.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 17. juli 1990 og eftir 1. viðgerð 19. juli beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 20. juli 1989 og hevur undir viðgerðini býtt seg í eitt meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Suna Jacobsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Durhuus og Finnbogi Ísakson) tekur undir við málinum, men mælir til at gera smávegis broytingar í uppskoti landsstýrisins til tess at fáa enn betur samsvar millum lógarorð og ætlan.

Eisini verður skotið upp, at lógarinnar gildistíð verður framlongd, so hendan betur samsvarar við prísskeið, prísískoytisskeið eins og sáttmálaskeiðini á avvarðandi parti av arbeiðsmarknaðinum.

Meirilutin vísir annars til viðmerkingar sínar í álitinum til løgtingsmál nr. 138/1989.

Sostatt setir meirilutin fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1 pkt. 1 verður orðið "manningini" broytt til: "skipara, manning".
2) Sum nýtt § 1, stk. 2. verður sett:

1) I § 1 pkt. 1 ændres ordet "mandskab" til: "skipper, mandskab".
2) Som nyt § 1, stk. 2 tilføjes:
"Ekstra drifts- og mand-

"Eyka rakstrar- og manningarstudningur verður ásettur fyri tíðarskeiðið 1. oktober til 31. mars 1991".

3) Í § 5 verður "januar" broytt til: "apríl".

skabsstøtte fastsættes for tidsrummet 1. oktober 1990 til 31. marts 1991".

3) I § 5 ændres "januar" til: "april".

Ein minniluti (Henrik Old) tekur undir við uppskot landsstýrisins um eyka rakstrar- og manningarstudning, men kann ikki góðtaka, at lógin verður tíðaravmarkað, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 5 í uppskoti í uppskoti landsstýrisins ganga út orðini: ", og fer úr gildi 1. januar 1991".

I § 5 i landsstyrets forslag udgår ordene: ", og ophæves 1. januar 1991".

Ein annar minniluti (Ernst Kass) mælir tinginum frá at samtykkja uppskot landsstýrisins. Víst verður annars til viðmerkingarnar í álitinum til løgtingsmál nr. 139/1989: Ráfiskabýti millum fiskavirkini.

FISKIVINNUNEVNDIN, 23. juli 1990.

Svend Aage Ellefsen | Suni Jacobsen | Jákup Lamhauge

Jógvan Durhuus | Finnbogi Ísakson | Henrik Old

Ernst Kass

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

Tlf. 11080 - Telex 81310 fingns fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

17. juli 1990

F. L. j. nr.
(at tilskila svarið)

JøH/pp

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 137/1989: Løgtingslóg um fiskoyti til fiskavirkir.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um fiskoyti til fiskavirkir.

§ 1. Úr landskassanum kann prísfiskoyti verða veitt føroyskum fiskavirkjum, sum framleiða virkaðan fisk og fiskavørur til útflutnings.

§ 2. Í hesi lóg:
a. er virkaður feskur fiskur, tann fiskur sum er meira viðgjørdur enn blóðgaður, kruvdur, sløgdur, avhøvdaður, umskipaður, skildur ella lagdur í onnur íløt. Hesi krøv eru minstukrøv.
b. eru fiskasløgini, sum koma undir skipanina, tey somu, sum nevnd eru í løgtingslóg um ráfiskabýti millum fiskavirki eins og vektin av ráfiski verður

lagtingslov om tilskud til fiskevirksomheder.

§ 1. Fra landskassen kan der ydes pristilskud til færøsk fiskevirksomhed, som producerer forarbejdet fisk og fiskevarer til eksport.

§ 2. I denne lov
a. er forarbejdet fersk fisk at forstå som fisk, der er mere forarbejdet end strubeskåret, opskåret, renset, hovedkappet, omskibet, sorteret eller ombragt i andre kasser. Dette er mindstekrav.
b. er fiskearterne, der er omfattet af ordningen de samme som er nævnt i lagtingslov om råfiskefordeling mellem fiskevirksomhed-

roknað á sama hátt sum eftir nevndu lóg.

§ 3. Ískoytið verður veitt í mun til, hvat støði fiskurin er virkaður til:

A. Fyri flákaskornan feskan fisk og fyri blokk verður veitt ískoyti á lægsta stigi.

B. Fyri 5 pund og vørur, sum kunnu sammetast við hetta, verður veitt ískoyti á øðrum stigi.

C. Fyri vørur, sum eru meira viðgjørdar enn 5 pund v.m. verður veitt ískoyti á hægsta stigi. Ískoytið á hægsta stigi kann býtast upp í fleiri stig.

Stk. 2. Ískoytið á teimum ymsu stigunum verður ásett út frá meirvirðinum til tað føroyska samfelagið, íroknað arbeiðslønir útgoldnar í Føroyum.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi 1. september 1990.

er ligesom vægten af råfisken bliver regnet på samme måde som efter nævnte lov.

§ 3. Tilskudet ydes i forhold til hvilket niveau fisken er forarbejdet til:

A. Fyri Fileteret fersk fisk og for blok ydes tilskud på laveste niveau .

B. For 5 pund og lignende varer ydes tilskud på 2. niveau.

C. For varer, som er mere forarbejdet end 5 pund m.m. ydes tilskud på højeste niveau. Tilskudet på højeste niveau kan inddeles i flere niveauer.

Stk. 2. Tilskudet på de forskellige niveuer bliver fastsat ud fra merværdien til det færøske samfund herunder arbejdslønninger udbetalt på Færøerne.

§ 4. Denne lov træder i kraft 1. september 1990.

Viðmerkingar.

Við tí endamáli at fáa fiskin virkaðan til best møguligan prís,

arbeiðsfólki, virkjum, fiskiførum og samfelagnum sum heilt til gagns, verður gjørd ein bonusskipan fyri góðskaðar vørur. Við hægri søluprísi og ískoyti skal virkaður fiskur geva virkjunum størri skiftiavlop, og ávirka avreiðingarprísin uppeftir.

Skal trygd fáast fyri, at fiskurin ikki bert verður vendur á góðvinum, og síðani seldur óvirkaður, ber ikki til at hava ískoytið beinleiðis á ráfiskinum, men hann má vera komin á eitt ávíst virkingarstig.

Tað er skotið upp at geva ískoyti ymiskt fyri ymisk viðgerðarstig. Tess meira rávøran verður arbeidd, sum heild má roknast við, at søluprísurin hækkar. Tó er hetta ikki altíð so, og tí kann ikki altíð verða langt ímillum, at ískoytið verður ásett. Men hóast prísurin ikki altíð er javnur upp aftir fyri hægri tilvirkingarstig, kann tó vera rætt at hava eitt ískoyti fyri at hjálpa til at halda eini framleiðslu í gongd eina tíð fyri ikki at missa ein marknað burtur aftur.

Tí eigur nevndin at fylgja væl við, hvussu marknaðarviðurskiftini eru.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 137/1989: Løgtingslóg um fiskavirkir.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 17. juli 1990 og eftir 1. viðgerð 19. juli 1990 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. juli 1990 og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutа og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Suno Jacobsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Durhuus og Finnbogi Ísakson) tekur undir við málinum.

Men vísandi til, at avvarðandi landsstýrismaður undir 1. viðgerð gjørdi vart við, at ein partur av lógartekstinum í uppskotinum var burturdottin, setir meirlutin fram niðanfyristandandi broytingaruppskot.

Skotið verður upp at landsstýrið saman við fiskivinnunevndini kemur at áseta fiskoytisupphæddirnar til tey ymsu viðgerðarstigini.

Haraftrat verður skotið upp at hvørt fiskoytisskeiðið skal vera árstjórðing.

Eisini verður skotið upp at gera lógartekstin smidligari í punkt A í § 3.

Meirilutin vísir annars til viðmerkingar sínar í álitinum til løgtingsmál nr. 138/1989 og setir fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t,

til

uppskot landsstýrisins

1) § 1 verður broytt til soljóðandi:	1) § 1 formuleres således: "Ved denne lov bemyndi-

"Heimilað verður landsstýrinum at veita úr landskassanum prísískoyti til føroysk fiskavirkir, sum framleiða virkaðan fisk og fiskavørur til útflutnings.

Stk. 2. Tað í stk. 1 nevnda prísískoyti verður ásett at galda frá hvørjum 1. januar, 1. apríl, 1. juli og 1. oktober".

2) § 3 A verður broytt til soljóðandi:

"A. Fyri skornan fisk sum á viðgerðarstigi kann sammetast við blokkframleiðsla verður veitt ískoyti á lægsta stigi".

ges landsstyret til at landskassens midler at betale pristilskud til færøske fiskevirksomheder, som producerer forarbejdet fisk og fiskevarer til eksport".

Stk. 2. Det i stk. 1 nævnte pristilskud fastsættes hver 1. januar, 1. april, 1. juli og 1. oktober.

2) § 3 A ændres til sålydende:

"A. For skåren fisk der på produktionsstadium kan sammenlignes med blokproduktion ydes tilskuld på laveste niveau".

Ein minniluti (Henrik Old) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men kann ikki taka undir við broytingaruppskoti meirilutans, tí eftir uppskoti meirilutans verður eingin partur av vinnuni umboðaður.

Eisini kann væntast, at hetta kemur at seina ásetanini av ískoytum til fiskavirkini.

Ein annar minniluti (Ernst Kass) mælir tinginum frá at samtykkja uppskot landsstýrisins. Víst verður annars til viðmerkingarnar í álitinum til løgtingsmál nr. 139/1989: Ráfiska-

býti millum fiskavirkini.

FISKIVINNUNEVNDIN, 23. juli 1990.

Svend Aage Ellefsen	Suni Jacobsen	Jákup Lanhauge
Jógvan Durhuus	Finnbogi Ísakson	Henrik Old
	Ernst Kass	

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn

Tlf. 11080 . Telex 81310 tingus fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

17. juli 1990

F. L. j. nr.
(at tilskriva í svari)

JøH/pp

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 138/1989: Løgtingslóg um minstapris á ráfiski.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um minstapris á ráfiski.	lagtingslov om minimumspris på råfisk.
§ 1. Ikki er loyvt, tá søla á uppboðssølu er undantikin, at avreiða ella at keypa ráfisk til matna frá føroyskum fiskifari til føroysk fiskavirki fyri lægri prís enn teir minstaprisir, sum ásettir eru eftir reglunum í hesi lóg.	§ 1. Det er ikke tilladt, med undtagelse af salg på auktion, at indhandle eller købe råfisk til konsum fra færøsk fiskevirksomhed for mindre end de minimumspriser, der er fastsat med hjemmel i denne lov.
§ 2. Landsstýrið skipar fyri, at nevnd verður sett at áseta minstaprísirnar. Nevndarlimir og varalimir verða tilnevndir og valdir soleiðis:	§ 2. Landsstyret nedsætter et udvalg til fastsættelse af minimumspriser. Medlemmer og suppleanter udpeges og vælges således:
1) Føroya Fiskimannafelag tilnevnir 1 lim og 1 varalim.	1) Føroya Fiskimannafelag udnævner 1 medlem og 1 suppleant.
2) Meginfelag Útróðrarmanna	2) Meginfelag Útróðrarmanna

tilnevnir 1 lim og 1 varalim.

3) Føroya Ráfiskakeyparafelag tilnevnir 2 lim og 2 varalim.

4) Hesir 4 limirnir í felag velja 1 formann og 1 varamann, sum ikki kunnu vera limir í teimum frammanfyri nevndu feløgum. Fæst ikki meiriluti fyri vali, verða teir uppnevndir av sorinskrivaranum.

Stk. 2. Nevndin setur í reglugerð tær gjøllari reglurnar fyri virki hennara, reglugerðin verður at góðkenna av landsstýrinum.

Stk. 3. Til dagligu fyrisitingina setir nevndin starvsfólk.

§ 3. Við atliti til upplýsingar frá fiskaútflytarum um søluprísir v.m. og metingar um framleiðslukostnað, sølukostnað og skiftisavlop ásetir nevndin minstapris fyri tey fiskasløg, sum nevnd eru í løgtingslóg um ráfiskabýti millum fiskavirki. Hesin minstiprísur eigur at verða undir marknaðarprísleguni. Vektin á ráfiski verður roknað á sama hátt sum eftir nevndu lóg.

Stk. 2. Ymiskir minstaprísir kunnu ásetast fyri ymiskar

udnævner 1 medlem og 1 suppleant.

3) Føroya Ráfiskarakeyparafelag udnævner 2 medlemmer og 2 suppleanter.

4) Følgende 4 medlemmer vælger i forening 1 formand og 1 næstformand, der ikke kan være medlemmer i de forannævnte organisationer. Opnås ikke flertal ved valg, udpeges disse af sorenskriveren.

Stk. 2. Udvalget fastsætter i reglement nærmere regler for dets virksomhed, reglementet skal godkendes af landsstyret.

Stk. 3. Udvalget ansætter personale til den daglige administration.

§ 3. Under hensyntagen til oplysninger fra fiskeeksportører om salgspriser m.m. og skøn over produktionsomkostninger, salgsomkostninger og dækningsbidrag fastsætter udvalget minimumspris for de fiskearter, som er nævnt i lagtingslov om råfiskefordeling mellem fiskevirksomheder. Denne mindstepris bør være under markedsprisniveauet. Vægten af råfisk bliver regnet på samme måde som efter nævnte lov.

Stk. 2. Der kan fastsættes

stoddir av sama fiskaslagi.

Stk. 3. Landsstýrið kann við góðkenning frá Fiskivinnunevnd Løgtingsins, áleggja nevndini at áseta minstapris fyri onnur ávís fiskasløg.

Stk. 4. Minstaprísir verða at seta fyri ein mánað ísenn, fyrstu ferð fyri 1. oktober 1990. Teir verða at áseta og at lýsa í Útvarpi Føroya og føroysku dagblaðunum, ikki seinri enn 10 dagar áðrenn mánaðurin byrjar.

§ 4. Avgerð nevndarinnar um minstaprísir kann innan eina viku frá fyrstu almannakunngerð skjótast inn fyri eina kærunevnd, sum verður skipað soleiðis:

1) Føroya Fiskimannafelag og Meginfelag Útróðrarmanna tilnevna 1 felag 1 lim og 1 varamann.
2) Føroya Ráfiskakeyparafelag tilnevnir 1 lim og 1 varamann.
3) Landsstýrið tilnevnir 2 limir og 2 varamenn. Annar limurin og varamaður hansara verða um gjørligt valdir millum limirnar í Búskaparráðnum, jbr. løgtingslóg nr. 42 frá 30.

forskellige minimumspriser for forskellige størrelser af samme fiskeart.

Stk. 3. Landsstyret kan med godkendelse fra lagtingets fiskeriudvalg pålægge udvalget at fastsætte minimumspriser for andre specifiserede fiskearter.

Stk. 4. Minimumspriserne fastsættes for en måned af gangen, første gang for 1. oktober 1990. De offentliggøres i Útvarp Føroya og de færøske aviser, ikke senere end 10 dage inden månedens begyndelse.

§ 4. Udvalgets afgørelse vedrørende minimumspriser kan inden 1 uge fra første offentliggørelse indbringes for et ankenævn, der sammensættes således:

1) Føroya Fiskimannafelag og Meginfelag Útróðrarmanna udnævner 1 medlem og 1 suppleant.
2) Føroya Ráfiskakeyparafelag udnævner 1 medlem og 1 suppleant.
3) Landsstyret udnævner 2 medlemmer og 2 suppleanter. Det ene medlem og dettes suppleant udpeges så vidt muligt blandt medlemmerne af det i lagtingslov nr. 42 af 20. mai 1963 omhandlede

mai 1963. Hin limurin og varamaður hansara skal hava aðra hægri útbúgving í roknskapi.

4) Nevndarformaðurin og varamaður hansara, ið báðir skulu vera løgfrøðingar, verða tilnevndir av sorinskrivaranum.

Stk. 2. Kærunevndin ger bindandi av, um prísásetingin byggir á fullgott grundarlag. Kemur hon til tað úrslit, at so er ikki, hevur prísásetingarnevndin skyldu til beinanvegin at taka prísásetingina til nýggja viðgerð og taka avgerð.

Stk. 3. Kærunevndarinnar avgerðir eru endaligar og kunnu ikki skjótast inn fyri dómstólarnar.

§ 5. Hesi kunnu bera seg undan starvinum sum limur ella varamaður í prísásetingarnevnd og kærunevnd:

1) Limur av landsstýri, løgtingi og fólkatingi kunnu ikki verða limir.
2) Tey, sum fylt hava 60 ár.
3) Tey, sum vegna heilsu ella vinnulig og húslig viðurskifti ikki uttan vanda fyri vælferð síni, kunnu røkja starvið.
4) Tey, sum ikki búgva í Føroyum.

økonomiske råd. Det andet medlem og dettes suppleant skal være statsautoriseret revisor eller have anden højere regnskabsmæssig uddannelse.

Stk. 2. Ankenævnet afgør med bindende virkning, om prisfastsættelsen bygger på forsvarligt grundlag. Kommer nævnet til det resultat, at dette ikke er tilfældet, er nævnet i henhold til § 1 forpligtet til straks at tage prisfastsættelsen op til ny behandling og træffe afgørelse.

Stk. 3. Ankenævnets afgørelser er endelige og kan ikke indbringes for domstolene.

§ 5. Følgende personer kan begære sig fritaget for hvervet som medlem eller suppleant i prisfastsættelsesudvalg og ankenævn:

1) Medlem af landsstyre, lagting og folketing kan ikke være medlemmer.
2) Personer, der er fyldt 60 år.
3) Personer, der på grund af deres helbredstilstand eller erhvervs- og familieforhold ikke uden fare for deres velfærd kan bestride

5) Tey, sum starvast undir vrakarastovninum.

Stk. 2. Eisini kann hann, sum í 5 ár hevur verið formaður í prísásetingarnevndini, krevja at sleppa undan formansstarvinum.

Stk. 3. Teir í § 4, stk. 1, nr. 3 og 4 nevndu limir og varalimir kunnu ikki vera ráfiskakeyparar, fiskaútflytarar, limir í útróðrarfelag ella limir í Føroya Fiskimannafelag.

Stk. 4. Sorinskrivarin tekur avgerð um tær í stk. 1 og 2 nevndu grundir at vera undantikin ella forðaður frá nevndarstarvi fyriliggja.

hvervet.

4) Personer, der ikke har bopæl på Færøerne.

5) Personer, der er ansat under vragerinstitution.

Stk. 2. Endvidere kan den, der i 5 år har været ansat som formand i prisfastsættelsesudvalget begære sig fritaget for formandshvervet.

Stk. 3. De i § 4, stk. 1, nr. 3 og 4 nævnte medlemmer kan ikke være råfiskekøber, fiskeeksportør, medlem i hjemmefiskerorganisation eller medlem i Færøya Fiskimannafelag.

Stk. 4. Sorenskriveren afgør hvorvidt de i stk. 1 og 2 nævnte fritagelses- eller udelukkelsesgrunde foreligger.

§ 6. Øll val og tilnevningar verða aftanað hvørt løgtingsval. Verður limur frítikin ella forðaður at virka í starvstíðini, ella hann vegna sjúku, burturferð ella annað lógligt forfall ikki fyribils kann røkja starvið, tekur varamaðurin við. Er varamaðurin eisini forðaður í at røkja starvið, verður varamaður valdur ella tilnevndur fyri henda.

§ 6. Alle valg og udpegelser finder sted efter hvert lagtingsvalg. Bliver et medlem fritaget eller udelukket i at deltage i udvalgsarbejdet, eller dette på grund af sygdom, bortrejse eller anden lovlig hindring ikke foreløbigt kan bestride hvervet træder suppleanten i hans sted. Er suppleanten også forhindret i at bestride hvervet, vælges eller udpeges en suppleant for denne.

§ 7. Limirnir í nevnd og kærunevnd eru undir tagnarskyldu viðvíkjandi tí, teir fáa at vita undir nevndararbeiðinum og sum eftir síni náttúru ikki eigur at verða borið víðari.

§ 7. Medlemmer i udvalg og ankenævn har tavshedspligt om det de får at vide under udvalgsarbejdet og som efter sin natur ikke bør videre-bringes.

§ 8. Øll tey, sum hava við útflytan av fiskavørum úr Føroyum at gera, hava eftir kravi frá nevndini ella kærunevndini skyldu til at geva allar upplýsingar prísviðurskiftum, útflutningsvørum og framleiðsluútreiðslum viðvíkjandi.

§ 8. Enhver, der eksporterer fiskevarer fra Færøerne, har efter påbud fra udvalget pligt til at give alle oplysninger om prisforhold, eksportvarer og produktionsomkostninger.

§ 9. Tær gjøllari reglurnar til fremjingar av lógini kann landsstýrið áseta í kunngerð.

§ 9. Landsstyret kan i bekendtgørelse fastsætte nærmere regler for lovens gennemførelse.

§ 10. Landskassin ber útreiðslurnar av hesi løgtingslóg.

§ 10. Landskassen afholder udgifterne af denne lagtingslov.

§ 11. Tann, sum ger brot á reglurnar eftir hesi løgtingslóg, kemur undir bót, um ikki harðari revsing er uppiborin.

§ 11. Medmindre strengere straf er forskyldt straffes med bøde den der ikke overholder reglerne i denne lagtingslov.

§ 12. Henda lóg kemur í gildi 1. september 1990.
Stk. 2. Samstundis fara úr gildi:
1) Løgtingslóg nr. 15 frá 5.

§ 12. Denne lov træder i kraft 1. september 1990.
Stk. 2. Samtidig ophæves:
1) Lagtingslov nr. 15 af 5. mai 1975 om råfiskefond,

mai 1975 um ráfiskagrunn, sum broytt við løgtingslógunum nr. 11 frá 3. mars 1977, nr. 73 frá 18. juli 1983 og nr. 36 frá 20. mai 1988.

2) Løgtingslóg nr. 50 frá 26. juni 1975 um lán til fiskavirkir.

som ændret ved Lagtingslov nr. 11 af 3. marts 1977, nr. 73 af 18. juli 1983 og nr. 36 af 20. mai 1988.

2) Lagtingslov nr. 50 af 26. juni 1975 om lån til fiskevirksomheder.

Viðmerkingar:

Í 1964 varð fyrsu ferð við lóg sett ein nevnd at áseta prísin á fiski, sum verður avreiddur í Føroyum.

Í 1975 kom lóg um Ráfiskagrunn. Eftir henni skuldi ein nevnd áseta ein avreiðingarprís, sum skip og manning fingu, og ein avrokningarprís, sum virkið rindaði fyri vøruna. Munurin millum hesar báðar prísir hevur verið latin sum studningur úr grunninum ella sum gjald inn í grunnin.

Í 1985 varð lóg um Studningsnevnd samtykt. Studningsnevndin hevur víðar heimildir at áseta ymiskar studningar umframt tann studning, sum hevur verið latin gjøgnum Ráfiskagrunnin.

Skotið verður nú upp at broyta skipanina soleiðis, at ein nevnd bert skal áseta ein minstaprís á fiski til matna, sum verður avreiddur til virkingar í Føroyum. Hesin prísur er ætlaður at vera veruligur minstaprísur og ikki ein miðalprísur. Ásett verður, hvørji fiskaslog skulu hava prís, men landsstýrið og Fiskivinnunevnd Løgtingsins kunnu áleggja nevndini at áseta prís fyri onnur fiskaslog eisini, t.d. gullaks, stinglaks og langasporl.

Minstaprísurin er ikki galdandi fyri fisk, ið verður seldur á uppboðssølu, men burtursæð frá hesum er ikki loyvt at selja ella

keypa fisk fyri minni pris.

Minstaprísir, sum nevndin ásetir, kunnu skjótast inn fyri eina kærunevnd.

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður

/Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 138/1989: Løgtingslóg um minstapris á rá-fiski.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 17. juli 1990 og eftir 1. viðgerð 19. juli 1990 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 20. juli 1990. Hetta løgtingsmál er viðgjørt saman við løgtingsmálunum nr. 134, 135, 136, 137, 139, 140, 141 og 142.

Fyri at fáa eina so gjølliga viðgerð av øllum lógaruppskotunum sum gjørligt hevur Fiskivinnunevndin boðsent flestu áhugabólkum innan fiskivinnuøkið.

Á fundi í nevndini hava soleiðis verið:

Umboð fyri Føroya Fiskimannafelag,
- - Føroya Skipara- og Navigatørfelag,
- - Føroya Reiðarafelag,
- - Fiskivinnuráðið,
- - Fiskivinnustarvsnevndina,
- - Ráfiskakeyparafelagið,
- - Meginfelag Útróðarmanna,

Landsstýrismenninir Olaf Olsen og Jógvan í. Olsen.

Haraftrat hevur nevndin fingið sendandi og hevur útvegað sær skrivligt tilfar málinum viðvíkjandi.

Nevndin hevur undir viðgerðini av hesum málunum býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Suni Jacobsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Durhuus og Finnbogi Ísakson) leggur undir við øllum uppskotum landsstýrisins við teimum viðmerkingum og broytingaruppskotum, sum eru at finna í álitunum til einstøku løgtingsmálini.

Meirilutin vísir annars á, at hann - soleiðis sum tað eisini skilst á einstøku broytingaruppskotunum - í ávísan mun hevur tikið til eftirtektar leiðbeining og ráðgeving frá teimum, sum hava verið á fundi í nevndini.

Haraftrat vísir meirilutin á, at umboð fyri teir tríggjar samgonguflokkarnar hin 10. febr. í ár undirritaðu "Uppritið um fiskivinnuna", har niðurfeldir vóru ymiskir málsetningar, sum samgonguflokkarnir høvdu sett sær, til tess at føroysk fiskivinna kundi mennast.

Í innganginum til uppritið verður sagt, at setningur samgonguflokkanna hevur verið:

At fáa greiðari skilnað í viðurskiftini millum vinnulívið og landskassan.

At skapa vinnuni so góð kor sum gjørligt, samstundis sum størri ábyrgd verður løgd út til vinnuna.

At eggja til, at veiddur fiskur fær bestu viðgerð á sjógvi og landi og útflutningsvøran soleiðis hægri prís.

At fáa ein so væl hóskandi fiskiflota sum gjørligt.

At laga viðurskiftini í vinnuni og samfelagnum sum heild eftir tí marknaðarprísi, sum fæst fyri okkara útflutningsvøru og

at eggja vinnuni til konsolidering í góðum tíðum, so hon er før fyri at standa ímóti, tá bakkøst koma av og á.

Tað er samsvarandi hesum uppriti, at landsstýrið hevur lagt fram løgtingsmálini frá nr. 134 til og við nr. 142/1989, sum nú hava verið til viðgerðar í nevndini, og sum meirilutin mælir løgtinginum at samtykkja við ávísum broytingum.

Beinleiðis í samsvar við uppritið er soleiðis málsetningurin fyri hesum fyriliggjandi lógaruppskotunum

1. Hetta í gjøgnum handilsliga kapping millum ráfiskakeyparar at fáa betra avreiðingarprísirnar á fiski, so fiskimenn og útgerðarfeløg fáa betri ørtøku.
2. Við bonusskipan at fáa fiskavirkini at viðgera ráfiskin longur fram at sjálvum borðdiskinum og harvið stovnseta fleiri arbeiðspláss innan framleiðsluvinnuna.
3. Á henda hátt at fáa hægri útflutningsprís fyri okkara rávørutilfeingi fyri at betra landsins handilsjavnað.

Hin vegin er eyðvitað, at størri handilslig krøv í

fyrstani kunnu kennast ørkymlandi og stundum eisini skapa ótryggleika hjá teimum, sum hava dagliga yrki sítt innan vinnugreinina.

Kortini er tað meirilutans meting, at landsstýrið hevur lagt upp fyri í so máta. Tí løgtingsmál nr. 141 um varðveitan av dagpeningaskipanini fer at tryggja fiskimanninum rímuligan mínstavinning, og løgtingsmál nr. 139 um ráfiskabýtið millum fiskavirkini fer at verja móti eini miðsavnan av vinnuni og fer soleiðis at tryggja framhaldandi virksemi úti kring oyggjarnar.

Tveir eyðsýndir fyrimunir við hesi nýggju skipanini fyri útróðrar- og fiskimenn eru, at í framtíðini skal einki gjald latast inn í nakran grunn, so sum vanligt hevur verið serliga hjá útróðrarmonnunum, og at prísískoyti verður avroknað skipa- og bátaeigarum samstundis, sum teir fáa prís fyri fiskin.

Meirilutin heldur eisini, at verkafólk fáa stórar fyrimunir við nýggju lógini um keyp av fiski frá útlendum til virkingar í Føroyum. Við at tilrættisleggja soleiðis, at frystur ráfiskur verður virkaður, tá ísaður ikki fæst, fær eisini hesin parturin av verkafjøldini støðugt arbeiði.

Aftan á at hava fundast við umboð fyri at kalla alla vinnuna, kennir meirilutin seg sannførdan um, at tey fyriliggjandi lógaruppskotini vísa na politisku kós, samgongan samfelagsins vegna hevur sett út í kortið fyri føroyska fiskivinnu.

Kortini má havast í huga, at "veður og vindur" kunnu krevja rættingar á leiðini, og í tí sambandinum bað meirilutin um eitt framhaldandi tætt samskifti í millum vinnu og politiskan myndugleika. Og meirilutin heldur seg hava fingið tryggd fyri - bæði frá Fiskivinnuráði og Fiskivinnustarvsnevnd - at møguligir óvæntaðir skeivleikar við nýggju skipanunum alt í einum fáa viðgerð í hesum nevndum við eini leiðbeining til tann politiska myndugleikan fyri eyga. Skuldi tað tá gjørst neyðugt, ivast meirilutin ikki í, at landsstýrið leggur uppskot fyri løgtingið um ábøtur á lógarverkið í so máta.

Meirilutin vísir annars til viðmerkingar sínar til tey einstøku løgtingsmálini.

Ein minniluti (Henrik Old) førir fram:

Greitt er, at her er talan um eina avskrift av lógini frá 1975, sum hevur reynst ónýtilig, og sum hevði tað við sær at tryggja flakavirkjum uttan mun til marknaðarpris og útreiðslur annars. Hinvegin var samtykt í 1988 ein broyting í hesi lóg, sum var grundað á marknaðarbúskap, og sum var sett í verk frá ársbyrjan 1990.

Hetta hevur ført við sær eina kapping bæði í avreiðingar- og søluliðinum. Tó má tað haldast at vera høpisleyst at seta skipanina frá 1975 í gildi aftur, sum í øllum førum ikki loysir nakrar trupulleikar.

Uppskot landsstýrisins førir eisini við sær, at fiskaprísirnir verða lægri, enn teir annars høvdu verið við núverandi skipan.

Minnilutin kann tí ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein annar minniluti (Ernst Kass) mælir tinginum frá at samtykkja uppskot landsstýrisins. Víst verður annars til viðmerkingarnar í álitinum til løgtingsmál nr. 139/1989: Ráfiskabýti millum fiskavirkini.

FISKIVINNUNEVNDIN, 23. juli 1990.

Svend Aage Ellefsen	Sunc Jacobsen	Jákup Lamhauge
Jógvan Durhuus	Finnbogi Ísakson	Henrik Old
	Ernst Kass	

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

17. juli 1990

F. L. j. nr.
(at tilskrifa í svari)

Tlf. 11080 . Telex 81310 lingas fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Arbeiðstið: Kl. 10—15. leygardag stongt

JøH/pp

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 139/1989: Ráfiskabýti millum fiskavirkini.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um ráfiskabýti millum fiskavirkini.	lagtingslov om råfiskefordeling mellem fiskerivirksomhederne.
§ 1. Lógin hevur til endamáls at býta ráfisk, jbr. stk. 2, sum føroysk fiskifør avreiða til føroysk fiskavirki, jbr. § 3, stk. 1 og stk. 2.	**§ 1.** Formålet med loven er at fordele råfisk jfr. stk. 2, som færøske fiskefartøjer indhandler til færøske fiskerivirksomheder, jfr. § 3, stk. 1 og stk. 2.
Stk. 2. Tey fiskasløg, ið koma undir ráfiskabýti eru: toskur, hýsa, brosma, longa, blálonga, upsi, steinbítur, havtaska, hvítingur, kalvi, reyðsprøka, tunga og kongafiskur.	**Stk. 2.** Følgende fiskearter er omfattet af råfiskefordelingen: torsk, kuller, brosme, lange, byrkelange, sej, havkat, havtaske, hvilling, helleflynder, rødspætte, rødtunge og rødfisk.
Stk. 3. Heildar ráfiskanøgdin verður roknað sum samlaða vektin av teimum í stk. 2 nevndu fiskasløgum kruvd við høvdi, kongafiskur tó ókruvdur.	**Stk. 3.** Den samlede råfiskemængde bliver regnet som den sammenlagte vægt af de i stk. 2 nævnte fiskearter renset og med hoved, rødfisk dog

urenset.

§ 2. Við tilráðing, grundað á stovnsmetingar frá Fiskirannsóknarstovuni og fiskivinnufyrisitingini, ásetir landsstýrið fyri hvørt álmanakkaárið við kunngerð eina heildar ráfiskanøgd, sum føroyskum fiskiførum er loyvd at avreiða til føroysk fiskavirki og sum fiskavirkjunum er loyvt at keypa frá fiskiførunum. Undantikið skipanini er ráfiskur seldur beinleiðis til brúkara ella til handil til smásølu í Føroyum.

Stk. 2. Fyri árið 1991 verður heildar ráfiskanøgdin sett til í mesta lagi 95% av samlaðu veiðinøgdini frá 1. desember 1989 til 1. desember 1990.

Stk. 3. Landsstýrið kann 1. juli, 1. oktober og 1. desember við góðkenning Fiskivinnunevnd Løgtingsins og um umstøðurnar tala fyri broyta tær í stk. 1 og 2 nevndu heildar ráfiskanøgdir.

§ 2. Med grundlag i vurderinger af bestanden foretaget af Fiskirannsóknarstovuni og Fiskivinnuumsitingini fastsætter landsstyret for hvert kalenderår i bekendtgørelse om samlet råfiskemængde, som færøske fiskefartøjer har tilladelse til at indhandle til færøske fiskevirksomheder og fiskevirksomhederne har tilladelse til at købe fra fiskefartøjerne. Undtaget ordningen er råfisk, der sælges direkte til forbruger eller til detailforretning på Færøerne.

Stk. 2. For året 1991 fastsættes den samlede råfiskemængde til maksimalt 95% af den samlede fangst fra 1. december 1989 til 1. december 1990.

Stk. 3. Landsstyret kan hver den 1. juli, 1. oktober og 1. december med godkendelse af lagtingets fiskeriudvalg og hvis omstændighederne taler derfor ændre de i stk. 1 og 2 nævnte samlede råfiskemængder.

§ 3. Heildar ráfiskanøgdin, tá 7.000 tons eru sett av til serligar framleiðslur jbr. stk. 2, og 6.000 tons til

§ 3. Den samlede råfiskemængde efter at 7.000 tons er afsat til særlig produktion, jfr. stk. 2 og 6.000 tons til

uppboðssølu verður býtt millum fiskavirkini, nevnd við bókstavum, soleiðis:

Klaksvík:
Virki A.....10,72%
Virki B..... 1,99%
Norðdepli:
Virki A..... 1,74%
Eiði:
Virki A..... 2,70%
Fuglafjørður:
Virki A..... 7,47%
Virki B..... 2,16%
Lorvík:
Virki A..... 4,62%
Toftir:
Virki A..... 6,21%
Runavík:
Virki A..... 6,52%
Strendur:
Virki A..... 4,21%
Haldórsvík:
Virki A..... 2,40%
Vestmanna:
Virki A..... 4,01%
Tórshavn:
Virki A..... 9,61%
Nólsoy:
Virki A..... 2,07%
Miðvágur:
Virki A..... 5,51%
Sørvágur:
Virki A..... 3,99%
Skopun:
Virki A..... 2,71%
Sandur:
Virki A..... 3,11%

auktion bliver fordelt således mellem fiskevirksomhederne, angivet med bogstaver:

Klaksvík:
Virksomh. A..... 10,72%
Virksomh. B..... 1,99%
Norðdepli:
Virksomh. A..... 1,74%
Eiði:
Virksomh. A..... 2,70%
Fuglafjørður:
Virksomh. A..... 7,47%
Virksomh. B..... 2,16%
Lorvík:
Virksomh. A..... 4,62%
Toftir:
Virksomh. A..... 6,21%
Runavík:
Virksomh. A..... 6,52%
Strendur:
Virksomh. A..... 4,21%
Haldórsvík:
Virksomh. A..... 2,40%
Vestmanna
Virksomh. A..... 4,01%
Tórshavn:
Virksomh. A..... 9,61%
Nólsoy:
Virksomh. A..... 2,07%
Miðvágur:
Virksomh. A..... 5,51%
Sørvágur:
Virksomh. A..... 3,99%
Skopun:
Virksomh. A..... 2,71%
Sandur:
Virksomh. A..... 3,11%

Hvalba:
Virki A..... 4,53%
Tvøroyri:
Virki A..... 7,55%
Vágur:
Virki A..... 6,60%

Stk. 2. Tey í stk. 1 nevndu 7.000 tons verða býtt soleiðis:

A ..... 1100 tons
B ..... 720 tons
C ..... 2550 tons
D ..... 1430 tons

Tey 1200 tonsini, ið eftir eru, og tær nøgdir tey undir A-D nevndu virkini ikki brúka, býtir landsstýrið við góðkenning Fiskivinnunevnd Løgtingsins til fiskavirkir.

Stk. 3. Landsstýrið ásetur við kunngerð nøvnini á teimum virkjum, sum nevnd eru við bókstavum í stk. 1 og 2.

Stk. 4. Uttan loyvi frá landsstýrinum er ikki loyvt fiskavirki at lata øðrum fiskavirki av tillutaðu nøgdini. Tó er loyvt, um nøgdirnar javnvega í vekt, at býta um fiskasløg millum virkir.

Stk. 5. Landsstýrið býtir eftir ummæli frá einstaka fiskavirkinum eftir stk. 1 ársnøgdina, ávíkavist broyttu ársnøgdina, í tonsum og í ársfjórðingum, teir fyrstu tveir ársfjórðingarnir tó

Hvalba:
Virksomh. A..... 4,53%
Tvøroyri:
Virksomh. A..... 7,55%
Vágur:
Virksomh. A..... 6,60%

Stk. 2. De i stk. 1 nævnte 7.000 tons bliver fordelt således mellem de følgende med bogstaver angivne fiskevirksomheder m.v.:

A ..... 1100 tons
B ..... 720 tons
C ..... 2550 tons
D ..... 1430 tons

De 1200 tons, der er tilbage, og de mængde de under A - D nævnte virksomheder ikke bruger, fordeler landsstyret med lagtingets fiskeriudvalgs godkendelse til fiskevirksomheder.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse navnene på de virksomheder, som er angivet med bogstaver i stk. 1 og 2.

Stk. 4. Uden landsstyrets tilladelse er det ikke tilladt fiskevirksomhed at overdrage nogen del af den tildelte mængde til en anden fiskevirksomhed, dog er det tilladt, hvis mængderne har samme vægt, at ombytte fiskearter mellem fiskevirksomheder.

Stk. 5. Landsstyret fordeler

undir einum, til fiskavirkið. Landsstýrið kann við góðkenning Fiskivinnunevnd Løgtingsins, um umstøðurnar tala fyri, broyta býtið millum tíðarskeiðini í árinum fyri øll fiskavirkini. Um fiskavirki í hálvárinum ávikavist í ársfjórðinginum ikki hevur tikið ímóti í minsta lagi 90% av tillutaðu nøgdini fyri tíðarskeiðið og um ikki heilt serligar umstøður tala ímóti, missir virkið rættin til nøgdina, sum rostar í tey 90%. Nøgdin verður býtt lutfalsliga millum tey virki, ið hildið hava býtisskipanina.

Stk. 6. Hevur fiskavirki í árinum tikið ímóti meira enn tillutaðari nøgd, verður tað, sum meira er, dripið frá tillutaðari nøgd árið eftir.

efter høring af den enkelte fiskevirksomhed efter stk. 1 årsmængden henholdsvis den ændrede årsmængde i tons pr. kvartal, de første to kvartaler dog under et til fiskevirksomheden. Hvis en fiskevirksomhed pr. halvår henholdsvis pr. kvartal ikke har modtaget mindst 90% af den tildelte mængde for perioden og hvis ikke helt særlige omstændigheder taler imod dette, taber virksomheden retten til den mængde, der mangler til de 90%. Mængden bliver fordelt forholdsmæssigt mellem de virksomheder, som har overholdt fordelingsordningen.

Stk. 6. Har fiskevirksomheden i løbet af året modtaget mere end den tildelte mængde, bliver det for meget modtagne fradraget i den tildelte mængde for det første halvår året efter.

§ 4. At tryggja, at fiskavirki halda býtisskipanina, verður landsstýrinum heimilað at seta fiskavirki forboð at keypa ráfisk og skipi forboð at avreiða ráfisk til fiskavirki ávíst tíðarskeið.

§ 4. For at sikre at fiskevirksomhederne overholder fordelingsordningen bemyndiges landsstyret til at forbyde en fiskevirksomhed at købe råfisk og til at forbyde skibe at indhandle råfisk til fiskevirksomheden i en vis periode.

§ 5. Fiskavirkir ella annar, sum ikki heldur reglurnar í lógini herundir boð ella forboð landsstýrisins við heimild í lógini, kemur undir bót og verður ólógligur vinningur konfiskeraður. (Bót og konfiskeraður vinningur fellur til landskassan og verður at nýta til minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna).

Stk. 2. Landsstýrið ásetur bótina og ólógliga vinningin uttan so, at málið verður lagt til rættin.

§ 5. Fiskevirksomheder eller andre, som ikke overholder reglerne i loven, herunder påbud eller forbud udstedt af landsstyret med hjemmel i loven, straffes med bøde og ulovlig fortjeneste konfiskeres. (Bøden og konfiskeret fortjeneste tilfalder landskassen og bliver brugt til mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet).

Stk. 2. Landsstyret fastsætter størrelsen af bøden og den ulovlige fortjeneste medmindre sagen indbringes for retten.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi 1. september 1990, tó soleiðis at fyrsta ráfiskabýtið verður fyri árið 1991.

§ 6. Denne lov træder i kraft 1. september 1990, dog således at første råfiskefordeling bliver for året 1991.

Viðmerkingar:

Av tí at framleiðsluorkan á teimum føroysku fiskavirkjunum er størri enn tann veiðunøgd, sum kemur upp á land, verður sambært hesi lóg ásett, at ráfiskurin skal býtast millum fiskavirkini. Hetta býti fevnir um flestoll fiskasløg.

Við at leggja 4 tey bestu av 6 teimum seinastu árunum (1984-89) saman hjá hvørjum virki sær er funnið fram til, hvussu stóran prosentpart av ársnøgdini, hvørt virki skal hava. Fiskirannsóknarstovan og fiskivinnuumsitingin skulu meta um, hvussu nógv verður veitt í næsta almanakkaári, og við hesum metingum sum grundarlagi ásetir landsstýrið eina heildar ráfiskanøgd fyri

árið.

Vísir tað seg, tá tað líður út á árið, at metingin er ov bjartskygd ella ov svartskygd, kann landsstýrið, við góðkenning frá fiskivinnunevndini, hækka ella lækka ta mettu ársnøgdina. Hetta kann gerast 1. juli, 1. oktober og/ella 1. desember.

Við teirri mettu veiðunøgdini fyri árið og teimum ásettu prosentpørtunum fyri hvørt virki sær sum grundarlagi verður ásett eitt tonsatal, sum hvørt virki kann taka ímóti í trimum tíðarskeiðum í álmanakkaárinum: frá 1. januar til 30. juni, frá 1. juli til 30. september og frá 1. oktober til 31. desember.

Í serligum førum, t.d. um óvanliga góður várfiskiskapur hevur við sær, at tær ásettu nøgdirnar eru ov smáar, kann landsstýrið við góðkenning frá fiskivinnunevndini, broyta ta nøgd, sum virkjunum er loyvt at taka ímóti í tíðarskeiðinum. Hækking ella lækking verður gjørd fyri øll virki sambært teimum ásettu prosentunum av veiðunøgdini, sum teimum er loyvt at taka ímóti.

Høvuðsreglan er, at virkini sjálvi skulu virka ta nøgd, tey taka ímóti. Tó kunnu tey frítt býta fiskasløg sínamillum, um nøgdirnar javnviga í vekt.

Haraftrat kann landsstýrið geva loyvi til frávik, um t.d. eitt virki í einum øki fær fisk frá øðrum virki í sama øki fyri at rationalisera raksturin, um mett verður, at hetta ikki ávirkar virksemið tilsamans í økinum munandi.

Um virkini ikki taka ímóti í minsta lagi 90% av teirri nøgd, sum teimum er tillutað í einum tíðarskeiði, missa tey rættin til ta nøgdina, sum restar í tey 90%. Tann nøgd, sum eitt virki missir, verður býtt lutfalsliga millum tey virki, sum hava hildið býtisskipanina. Undantak kann tó gerast, tá serligar umstøður tala ímóti, at eitt virki missir rættin til ein part av veiðunøgdini, t.d. um virkið av einihvørjari orsøk hevur ligið stilt.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1, stk. 1: Lógin fevnir um allan tann ráfisk uttan mun til, hvar hann er veiddur á landleiðini ella aðrastaðni, sum føroysk fiskifør, t.e. bæði skip og bátar, avreiða í Føroyum.

Til § 2, stk. 1, 2. pkt.: Talan er um smærri nøgdir, sum ikki verða nýttar til vinnuliga framleiðslu ella útflutnings.

Til § 3, stk. 1, stk. 2 og stk. 3: Fyri at sleppa undan lógarbroyting tá virki skiftir eigara ella navn oftast í samband við, at tað verður selt, verða virkini nevnd við bókstavum. Landsstýrið setir nøvn á í kunngerð og sær yvirlitið yvir virkini nakað soleiðis út:

Til stk. 1:

1. Norðoyggjar:

Klaksvík:

Virki A: Kósavirkið

Virki B: Joensen & Olsen

Norðdepli:

Virki A: Frostvirkið

2. Eysturoy:

Eiði:

Virki A: Norðis

Fuglafjørður:

Virki A: Handils- og Frystivirkið

Virki B: Harfrost

Lorvík:

Virki A: Frost

Toftir:

Virki A: Nykur

Runavík:

Virki A: Lynfrost

Strendur:

Virki A: Stranda Flakavirki

3. Norðstreymoy:

Haldórsvík:

Virki A: Víkarvirkið

Vestmanna:

Virki A: Vestmanna Flakavirki

4. Suðurstreymoy:

Tórshavn:

Virki A: Bacalao

Nólsoy:

Virki A: Nólsoyar Flakavirki

5. Vágoy:

Miðvágur:

Virki A: Snarfrost

Sørvágur:

Virki A: Sørvágs Flakavirki

6. Sandoy:

Skopun:

Virki A: Sólarris

Sand:

Virki A: Borgin

7. Suðuroy:

Hvalba:

Virki A: Fisk

Tvøroyri:

Virki A: Tvøroyrar Flakavirki

Vágur:

Virki A: Polarfrost

Til stk. 2:

A: Fiskavirkið, Norðagøtu

B: Fiskpakk, Oyndarfirði

C: Klaksvíkar Roykivirki

D: Vaðhorn, Skála

E: Landsstýrinum at ráða yvir.

Til § 3, stk. 5: Í ársfjórðinginum hevur fiskavirki skyldu at keypa í minsta lagi 90% av ársfjórðingskvotuni, teir fyrstu tveir ársfjórðingarnar tó samanlagdir, um tað ikki skal missa ta nøgdina, sum restar í tey 90%.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/ Kjartan Hoydal

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 139/1989: Ráfiskabýti millum fiskavirkini.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 17. juli 1990 og eftir 1. viðgerð 19. juli beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 20. juli 1990 og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Sune Jacobsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Durhuus og Finnbogi Ísakson) tekur undir við landsstýrinum við nøkrum broytingum:

Mælt verður til:

1. At broyta § 1 stk. 2 so svartkalvi kemur við í ráfiskabýti.

2. At broyta stk. 1. í § 2 soleiðis at ásetingin av heildar ráfiskanøgdini heldur verður grundað á útlitið fyri veiðunøgd (t.e. veiðuorku o.l.) enn á stovnsmetingar; hettar fyri ikki at tvinna saman ráfiskabýtið millum virkini og eina møguliga komandi ásetan av "mest loyvdu veiðu" (TAC).

3. At geva landsstýrinum saman við fiskivinnunevndini heimild at býta øll tey 7000 tonsini millum fiskavirkir jbr. § 3, stk. 2, sum annars ikki eru við í ráfiskabýtinum.

4. At staðfesta at § 3 stk. 4 snýr seg um tey í stk. 1 nevndu virkini.

5. At ganga burtur frá konfiskatión av møguligum ólógligum vinningi, men heldur halda seg til bert at geva bót jbr. § 5.

Annars vísir meirilutin til viðmerkingar sínar í álitinum til løgtingsmál nr. 138/1989 og setir fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1. Í § 1 stk. 2 verður aftaná orðið "tunga" sett: ", svartkalvi og kongafiskur".
2. § 2 punkt 1 í stk. 1 verður soljóðandi:
"Við tilráðingum frá Fiskirannsóknarstovuni og Fiskivinnuumsitingini um væntaða veiðunøgd árið eftir sum grundarlagi ásetir landsstýrið fyri hvørt álmannakkaár við kunngerð eina heildar ráfiskanøgd, sum føroyskum fiskiførum er loyvd at avreiða til føroysk fiskavirki, og sum fiskavirkjunum er loyvt at keypa frá føroyskum fiskiførum."
3. § 3 stk. 2 verður orðað:
"Tey í stk. 1 nevndu 7000 tons býtir landsstýrið við góðkenning frá Fiskivinnunevnd Løgtingsins til fiskavirkir, sum ikki eru við í ráfiskabýtinum".

1. I § 1 stk. 2 indsættes efter "rødtunge": ", helleflynder og rødfisk".
2. § 2 pkt. 1 i stk. 1 formuleres:
"Med grundlag i vurderinger af Fiskirannsóknarstovuni og Fiskivinnuumsitingini om forventet fangstmængde året efter som grundlag, fastsætter landsstyret for hvert kalenderår i bekendtgørelse en samlet råfiskemængde, som færøske fiskefartøjer har tilladelse at indhandle til færøske fiskevirksomheder, og som fiskevirksomhederne har tilladelse til at købe fra fiskefartøjerne".
3. § 3 stk. 2 formuleres:
"De i stk. 1 nævnte 7000 tons fordeler landsstyret med godkendelse af Lagtingets fiskeriudvalg til de fiskevirksomheder som ikke er med i

4. Í § 3 stk. 3 gongur út: "og 2".
5. § 3 stk. 4 pkt. 1 verður orðað:
"Uttan loyvi frá landsstýrinum er ikki loyvt teimum í stk. 1 nevndu fiskavirkjum at lata øðrum fiskavirki av tilíutaðu nøgdini".
6. § 5 verður orðað:
"Fiskavirki ella annar, sum ikki heldur reglurnar í lógini herundir boð ella forboð landsstýrisins við heimild í lógini, kemur undir bót".

ráfiskefordelingen".
4. I § 3 stk. 3 udgår:
"og 2",
5. § 3 stk. 4 pkt. 1 formuleres således:
"Uden landsstyrets tilladelse er det ikke tilladt dem i stk. 1 nævnte fiskevirksomheder at overdrage andre fiskevirksomheder nogen del af den tildelte mængde".
6. § 5 formuleres:
"Fiskevirksomheder eller andre, som ikke overholder reglerne i loven herunder påbud eller forbud udstedt af landsstyret med hjemmel i loven, straffes med bøde".

Ein minniluti (Henrik Old) førir fram:

Undir viðgerðini í fiskivinnunevndini kom týðiliga fram, at eingir partar av vinnuni hildu fiskabýtið vera til fyrimunar fyri fiskivinnuna.

Víst var á, at hetta býtið fremur einki kappingarføri, men júst hitt øvugta.

Minnilutin kann ikki vera samdur við sjónarmiðunum meirilutans, tá sagt verður, at teir í ávísan mun hava tikið til eftirtektar leiðbeiningar og ráðgeving frá vinnuni, sum vóru á fundi við nevndina.

Tá hugsað verður um tað umdømi, ið Einahandilin hevur havt millum manna her á landi, kann ein ikki annað enn ógvast, at menn í dag aftur vilja seta í verk eina skipan, ið ber á tað borðið, sum beinir fyri allari kapping.

Minnilutin (Henrik Old) kann ikki taka undir við, at rætturin til at keypa so at siga allan fisk, sum kemur á land í Føroyum, verður latin nøkrum fáum.

Minnilutin mælir tí til, at hetta mál fær nýggja viðgerð, soleiðis at allir partar í fiskivinnuni kunnu koma til orða, og saman við nývalda fiskivinnuráðnum verður funnin ein haldgóð loysn.

Minnilutin (Ernst Kass) førir fram, at umstøðurnar at gera eitt munagott arbeiði í sambandi við fiskivinnuuppskotini, hevur ikki verið til staðar hvørki áðrenn ella undir nevndararbeiðinum í fiskivinnunevndini, og skuldu vit annars fylgt tilmælunum frá vinnufeløgunum, sum vórðu innkallað, so áttu øll málini at verið útsett, inntil greiða varð fingin á fleiri týðandi spurningum.

Seint leygarkvøldið fekk minnilutin støðuna hjá meirilutanum til uppskot landsstýrisins við boðum um, at álit sjálvstýrisflokkins skuldi liggja klárt til mánamorgunin kl. 08°°. Hetta hevur sjálvsagt ført við sær, at halgidagsfriðurin mátti brótast, og at partar av álitunum máttu gerast klárir sunnudagin, fyri at fylgja óhøvuska og ókristna arbeiðshátti samgongunnar.

Saman við boðunum um, at brot skuldu gerast á halgidagsfriðin, vórðu honskrivaðar viðmerkingar frá meirilutanum frá fiskivinnunevndini, og tær hava gjørt arbeiðið í sambandi við fiskivinnuuppskotini uppaftur truplari.

Sjálvstýrisflokkurin er sannførdur um, at samgongan hevur sett sær fyri at skunda málini ígjøgnum. Ræðslan fyri, at partar av vinnuni skulu tinma út av, hvørjar avleiðingar veruliga standast av hesum uppskotum, er so stór, at einasti møguleiki fyri at fáa tey samtykt, er jást hesin marghættligi arbeiðshátturin.

Minnilutin kann ikki góðtaka, at ongar útrokningar fyriliggja um hvørjar avleiðingar, hesi uppskot fáa, hvørki fyri vinnuna, sjóføIk, fiskaetovnar ella búskap okkara í sini heild, og sjálvt undir nevndarviðgerðini hevur tað ikki verið gjørligt at fingið hesar upplýsingar á borðið.

Tað, sum fyrst og fremst eyðkennir hesi uppskotini,

er, at fiskivinnan skal stýrast við harðari hond úr Tinganesi, og úrslitið av hesum verður ein sentralstýring av allari vinnuni, og planbúskaparliga mynstrið sum flestu sosialistisku londini eystanfyri hava slept, verður nú innført í Føroyum av flokkum, sum kalla seg borgarligar og liberalar, sum nú í loydum innføra stalinistiskan planbúskap í víðastu merking.

Sjálvstýrisflokkurin er sannførdur um, at uppskotini í tí líki, tey í dag hava, fáa katastrofalar fylgjur fyri føroyska samfelagið. Kappingarmynstrið verður burturbeint, hugurin hjá einstalinginum at reka vinnu á sjónum, hvørvur av sær sjálvum, og framtíðardreymar hjá okkara unga fólki, sum ætlar sær undir sjóvinnu, verða lagdir í sor.

Einastu, sum hava møguleika at reka veruliga vinnu, verða ávís vinnulívsfólk, og tað bera uppskotini eisini dám av. Eftir uppskotunum at døma verða stórar upphæddir fluttar hesum fólkum, tí soleiðis sum uppskotini eru orðað, er bert eftir at oyramerkja upphæddirnar, har tær eru ætlaðar.

Sjálvstýrisflokkurin ivast onga løtu í, at hondan roynd samgongunnar er ein roynd at máa støðið undan frían marknaðarkreftunum til fyrimunar fyri nøkur fá útvald fólk, sum frammanundan hava sett sær fyri at ráða øllum handli á føroyskari jørð.

Minnilutin heldur, at slíkur álvarsamur pástandur ikki eigur at sleppa at standa einsamallur, og setir tí fram soljóðandi

I U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka uppskotini aftur, og at uppskotini ikki verða løgd fyri tingið aftur fyrr enn samskipað tilmæli fyriliggja frá fiskivinnuráðnum og vinnuni.

Um omanfyrinevnda uppskot ikki verður samtykt, verður sett soljóðandi

II U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera útrokningar av, hvørjar aveiðingar uppskot landsstýrisins fáa fyri einstaklingar, vinnuna, sjófólk, fiskastovnarnar og búskap landsins, áðrenn uppskotini verða sett í verk.

Umframt tað, at uppskotini einki siga um, hvørjar avleiðingar tey fáa fyri samfelagið í sini heild, gongur tað greitt fram av uppskotunum, at fría marknaðarstøðan, soleiðis sum vit kenna hana í dag, verður skerd munandi. Landsstýrið hevur longu sett forboð móti útflutningi av ávísum riskaslagi, og tí verður sett fram soljóðandi

III U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at avtaka øll forboð móti sølu av fiski til útheimin.

Í fiskivinnuuppskotinum verður einki sagt um sølupolitikkin av fiskavørum, og tað tykist tí greitt, at ongar broytingar verða, sum koma at føra við sær stórvegis broytingar í sølumynstrinum hjá teimum, sum selja fiskavørurnar til marknað. Ein trupulleiki, sum tyktist at hava forðað fyri fríari marknaðarsølu, er limaskapur í ávisum sølufelag, og tí verður sett soljóðandi

IV U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at eingin limaskapur í nøkrum felag skal kunna forða fyri, at einstaklingar, bátar, skip og vinnufyritøkur av einum og hvørjum slagi, skulu kunna selja sínar vørur frítt uttan mun til limaskap.

Í uppskotunum, sum landsstýrið hevur lagt fram, verður heldur einki sagt um EF samráðingarnar, hvørja ávirkan hesar fáa fyri fiskivinnuna og samfelagið í sini heild, og tað tykist sum um samráðingarnar verða førdar á ein slíkan hátt, at eingin møguleiki er at sleppa undan limaskapi, og tá vit lesa einstøk samgongubløð kundi tað verið mangt, sum bendi á, at júst hetta er ætlanin, og tí verður sett soljóðandi

V U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at Føroyar skulu ikki søkja um EF-limaskap.

Tað framgongur klárt og týðiliga av uppskotum landsstýrisins, at nógv viðurskifti eiga at kannast til fulnar, áðrenn tey eru búgvin til støðutoku. Ongar fyritreytir verða skaptar av at reka fiskivinnu, hvørki fyri skip ella virkir. Heldur ikki fyri sjófólk ella flakafólk.

Uppskotini skapa heldur ikki fíggjarligar fyritreytir, og búskaparliga støðan kemur, um uppskotini verða samtykt, at

standa við og versna, og tí verður mælt til, at uppskot sjálvstýrisflokksins til samtyktar verða samtykt.

FISKIVINNUNEVNDIN, 23. juli 1990.

Svend Aage Ellefsen | Suni Jacobsen | Jákup Lamhauge

Jógvan Durhuus | Finnbogi Ísakson | Henrik Old

Erna Kass

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 17. juli 1990

F. L. j. nr.
(at tilskrive ved svar)

Tlf. 11080. Telex 81310 tinghs fa. Telefax 14942. Postboks 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

KjH/pp

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 140/1989: Løgtingslóg um royndaruppboðssølu av fiski.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um royndaruppboðssølu av fiski.	lagtingslov om forsøgsauktion for fisk.
§ 1. Heimilað verður landsstýrinum at stovna og reka eina sjálvbodna royndaruppboðssølu av fiski v.m. jbr. § 2.	**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til at oprette og drive en frivillig forsøgsauktion for fisk m.m. jbr. § 2.
Stk. 2. Umframt uppboðssølu á landi kann landsstýrið skipa fyri telefonuppboðssølu millum fiskifar og keypara.	**Stk. 2.** Udover auktion på land kan landsstyret forestå en telefonauktion mellem fiskefartøj og købere.
§ 2. Á royndaruppboðssøluni kunnu seljast:	**§ 2.** På forsøgsauktion kan sælges:
a. 6.000 tons býtt á 40 vikur við umleið 150 tonsum um vikuna av teimum í lógini um ráfiskabýti nevndu fiskasløgum løgd inn á uppboðið beinleiðis frá føroyskum fiskifari,	a. 6.000 tons fordelt på 40 uger med omkring 150 tons om ugen af de i loven om råfiskefordeling nævnte fiskearter indleveret på auktionen direkte fra færøsk fiskefartøj.

b. øll onnur fiskasiøg, sum ikki eru undir býtinum nevnd undir a. og onnur sjódýr,

c. fiskur og sjódýr frá fremmandum fiskifari, sum hevur fingið loyvi til innflutning.

b. alle andre fiskearter, som ikke er omfattet af fordelingen nævnt under a. og andre marine dyrearter.

c. fisk og marine dyrearter fra udenlandsk fiskefartøj, som har fået importtilladelse.

§ 3. Landsstýrið setir leiðara av royndaruppboðssøluni.

Stk. 2. Landskassin stendur fyri rakstrinum av royndaruppboðssøluni, sum verður at reka eftir handilsligum reglum.

Stk. 3. Seljari, ið letur fisk v.m. inn, skal lata eitt prosentgjald roknað av søluvirðinum, sum landsstýrið ásetir.

Stk. 4. Bert tey, sum búsett eru í Føroyum ella feløg skrásett í Føroyum, kunnu bjóða á royndaruppboðssøluni. Keypari skal veita bankatrygd ella aðra nóg góða trygd fyri keypinum.

§ 3. Landsstyret udpeger lederen af forsøgsauktionen.

Stk. 2. Landskassen står for driften af forsøgsauktionen, som skal drives efter forretningsmæssige hensyn.

Stk. 3. Sælger, der indleverer fisk m.m., skal indbetale en procentsats af salgsværdien, som fastsættes af landsstyret.

Stk. 4. Kun personer, der er bosiddende på Færøerne eller selskaber registreret på Færøerne, kan afgive bud på forsøgsauktionen. Køber skal tilvejebringe bankgaranti eller anden tilsvarende sikkerhed for købet.

§ 4. Uppboðssøluhølið og innretting skal góðkennast av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

§ 4. Auktionshallen og indretning skal godkendes af Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

§ 5. Tær gjøllari reglurnar til fremjingar av lógini kann landsstýrið áseta í kunngerð

§ 5. Landsstyret kan i bekendtgørelse eller reglement fastsætte nærmere regler for

ella reglugerð.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst. Samstundis fer úr gildi lóg nr. 28 frá 17. mars 1892 "om salg af fersk fisk m.m. ved offentlig auktion".

lovens gennemførelse.

§ 6. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse. Samtidig ophæves lov nr. 28 af 17. marts 1892 "om salg af fersk fisk m.m. ved offentlig auktion".

Viðmerkingar:

Eftir hesum uppskoti stovnar landsstýrið eina uppboðssølu. Uppboðssølan skal vera í Klaksvík fyrra hálvár í 1991 og á Toftum seinna hálvár í 1991.

Royndaruppboðssølan verður almenn. Er grundarlag fyri at halda fram, verður uppskot lagt fyrí tingið um treytir, sum skulu setast privatum uppboðssølum. Tann almenna sølan verður tá tikin av.

Í royndartíðini kann uppboðssølan selja 150 tons um vikuna í 40 vikur av teimum fiskasløgum, sum eru við í býtinum millum fiskavirki, og óavmarkaða nøgd av øðrum fiskasløgum. Royndartíðin varir tó longri enn 40 vikur, tí eingin uppboðssøla verður summar vikur, m.a. á jólum.

Olaf Olsen
landsstýrismaður

/ Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 140/1989: Løgtingslóg um royndaruppboðssølu av fiski.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 17. juli 1990 og eftir 1. viðgerð 19. juli beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. juli 1990 og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Suni Jacobsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Durhuus og Finnbogi Ísakson) tekur undir við málinum, men vísir annars á, at avvarðandi landsstýrismaðurin undir 1. viðgerð gjørdi vart við, at størri broytingar mátti gerast í lógartekstinum, fyri at lógin kundi samsvara við ta ætlan samgongan hevur viðvíkjandi royndaruppboðssøluni og uppboðssøluni yvir telefon.

Meirilutin hevur tí avrátt at seta fram nýtt lógaruppskot í staðin fyri uppskot landsstýrisins.

Munurin millum gamla og nýggja uppskotið er:

1. Upphæddin, ið nýtast kann úr landskassanum til royndaruppboðssøluna verður avmarkað til tríggjar mió.kr.
2. Procentgjaldið til uppboðssøluna frá seljaranum verður nú í lógini ásett til 6% av søluprísinum.
3. Tað verður í lógini ásett, at lønjavningargrunnurin skal fyrisita telefonuppboðssøluna yvir telefon.
4. Tað verður fastlagt, at fiskurin, sum seldur verður á uppboðssøluni yvir telefon, er býtisfiskur fyri lógini um ráfiskabýti millum flakavirkini.

Annars vísir meirilutin á, at landsstýrið fyrst í komandi tingsetu fer at leggja fyri løgtingið uppskot um lógarheimild til at veita flutningsstudning, har miðað verður í móti at seta øll virkir í landinum javnt, tá um flutningsútreiðslur umræður.

Meirilutin vísir annars til viðmerkingar sínar í

løgtingsmáli nr. 138/1989.

Sostatt setir meirilutin fram í staðin fyri uppskot landsstýrisins soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingsióg

um

royndaruppboðssølu av fiski.

§ 1. Heimilað verður landsstýrinum at leggja út úr landskassanum upp til 3 mió.kr. til at stovna og reka royndaruppboðssølu av fiski v.m., jbr. § 2.

§ 2. Á royndaruppboðssøluni kunnu seljast:

a. 6.000 tons býtt á 40 vikur við umleið 150 tonsum um vikuna av teimum í lógini um ráfiskabýti nevndu fiskasløgum løgd inn á uppboðið beinleiðis frá føroyskum fiskifari,

b. øll onnur fiskasløg, sum ikki eru undir býtinum nevnd undir a. og onnur sjódýr,

c. fiskur og sjódýr frá fremmandum fiskifari,

lagtingslov

om

forsøgsauktion for fisk.

§1. Landsstyret bemyndiges til at betale ud af landskassens midler op til kr. 3 mill. til at oprette og drive forsøgsauktion for fisk m.m. jfr. § 2.

§ 2. På forsøgsauktion kan sælges:

1. 6.000 tons fordelt på 40 uger med omkring 150 tons om ugen af de i loven om råfiskefordeling nævnte fiskearter indleveret på auktionen direkte fra færøsk fiskefartøj.

b. alle andre fiskearter, som ikke er omfattet af fordelingen nævnt under a. og andre marine dyrearter.

c. fisk og marine dyrearter fra udenlandsk

sum hevur fingið loyvi til innflutning.

§ 3. Landsstýrið setir leiðara av royndaruppboðssøluni.
Stk. 2. Landskassin stendur fyri rakstrinum av royndaruppboðssøluni.
Stk. 3. Seljari, ið letur fisk v.m. inn, skal lata uppboðssøluni 5% av søluvirðinum, sum landsstýrið ásetir.
Stk. 4. Bert tey, sum búsett eru í Føroyum, ella feløg, skrásett í Føroyum, kunnu bjóða á royndaruppboðssøluni. Keypari skal veita bankatrygd ella aðra nóg góða trygd fyri keypinum.

§ 4. Uppboðssøluhølið og innretting skal góðkennast av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

§ 5. Umframt royndaruppboðssølu á landi, kann landsstýrið skipa fyri uppboðssølu gjøgnum telefon millum fiskifar og keypara.
Stk. 2. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna hevur hesa uppboðssølu um hendi.

fiskefartøj, som har fået importtilladelse.

§ 3. Landsstyret udpeger lederen af forsøgsauktionen.
Stk. 2. Landskassen står for driften af forsøgsauktionen.
Stk. 3. Sælger, der indleverer fisk m.m., skal til auktionsledelsen indbetale 5 procent af salgsværdien, som fastsættes af landsstyret.
Stk. 4. Kun personer, der er bosiddende på Færøerne eller selskaber registreret på Færøerne, kan afgive bud på forsøgsauktionen. Køber skal tilvejebringe bankgaranti eller anden tilsvarende sikkerhed for købet

§ 4. Auktionshallen og indretning skal godkendes af Heilsufrøðiliga Starvsstovan.

§ 5. Foruden forsøgsauktionen på land bemyndiges landsstyret til at organisere auktionssalg pr. telefon mellem fiskeskib og køber.
Stk. 2. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna administrer ordningen.

Stk. 3. Øll tiskasløg kunnu seljast á uppboðssølu gjøgnum telefon.
Stk. 4. Fiskur, sum er við í ráfiskabýtinum millum fiskavirkini, jbr. løgtingsmál nr. 139, § 1, stk. 2, og sum verður seldur á uppboðssøluni yvir telefon, verður roknaður upp í hetta býtið.

§ 6.Tær gjøllaru reglurnar til fremjingar av lógini kann landsstýrið áseta í kunngerð ella reglugerð.

§ 7. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst. Samstundis fer úr gildi lóg nr. 28 frá 17. mars 1892 "om salg af fersk fisk m.m. ved offentlig auktion".

Stk. 3. Auktionssalget pr. telefon omfatter alle fiskearter.
Stk. 4. Fisk, der er omfattet af råfiskevirksomhederne, jfr. lagtingssag nr. 139, § 1, stk. 2, og som sælges på auktion pr. telefon, omfattes også af denne fordeling.

§ 6. Landsstyret kan i bekendtgørelse eller reglement fastsætte nærmere regler for lovens gennemførelse.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse. Samtidig ophæves lov nr. 28 af 17. marts 1892 "om salg af fersk fisk m.m. ved offentlig auktion".

Ein minniluti (Henrik Old) tekur undir við broytingaruppskoti meirilutans, men heldur, at rættast er, at ein minstiprísur verður galdandi á uppboðssøluni, og setir tí fram broytingaruppskot til uppskot meirilutans í § 2 sum nýtt lítra d:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot meirlutans

Í § 2, 1. stk. verður skoytt uppí sum nýtt litra d:

"d. Ásettur verður ein minst loyvdi prísur á uppboðssølu við marknaðarprísi sum grundarlag."

Til § 2, stk. 1 tilføjes som nyt litra d:

"d. Der fastlægges en minimumspris med markedsprisen på auktionen som grundlag."

Annars vísir minnilutin á, at í staðin fyri at nýta stórar peningsupphæddir til flutningsstuðning frá uppboðssøluni og fyri at fáa eitt betri reyndargrundarlag fyri uppboðssøluni, og samstundis vísandi til, at stórar nøgdir verða fiskaðar á syðru Føroya-leiðini, hevði verið rættast, at uppboðssøla eisini verður sett á stovn í syðra enda í landinum, og setir minnilutin tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum eisini at seta á stovn reyndaruppboðssølu í Vági.

Ein annar minniluti (Ernst Kass) mælir tinginum frá at samtykkja uppskot landsstýrisins. Vist verður annars til viðmerkingarnar í álitinum til løgtingsmál nr. 139/1989: Ráfiskabýti millum fiskavirkini.

FISKIVINNUNEVNDIN, 23. juli 1990.

Svend Aage Ellefsen — Suni Jacobsen — Jákup Lamhauge

Jógvan Durhuus — Finnbogi Ísakson — Henrik Old

Ernst Kass

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 12080 . Telex 81320 lingns sa . Telefax 14942 . Posthox 64
Arbeiðstíð: Kl. 10—15. leygardag stongt

17. juli 1990

F. L. j. nr.
at tilskila: svarn

EF/pp

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 141/1989: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 48 frá 28. mai 1984 um minstuløn til fiskivinnuna við seinni broytingum verður sum nýggj § 2, stk. 2, sett:	I lagtingslov nr. 48 af 28. maj 1984 om mindsteløn til fiskerierhvervet med senere ændringer sættes som ny § 2, stk. 2:
A) "Fyri Trolarar á feskfiskaveiðu Saltfiskiskip á línuveiðu Fristiskip á hemara- og svartkalvaveiðu v.m. Verksmiðjutrolarar á svartkjaftaveiðu	A) "For Trawlere på fiskeri efter ferskfisk Saltfiskeskib på linefiskeri Fryseskib på fiskeri efter sildehaj eller hellefisk

Nótaskip
Ídnaðartrolarar
Verksmiðjutrolarar sum salta ella fyrsta veiðuna umborð
Frystiskip á rækju- ella skeljaveiðu
Skip á laksaveiðu

verður við núverandi minstuløn veitt hvørjum manni eyka kr. 167,19 fyri hvønn mynstraðan dag á túrinum. Henda viðbót verður minka við 28 oyrum fyri hvørja krónu sum fiskipartur, íroknað minstuløn og manningarstudningur fyri hvønn dagin fer upp um galdandi minstuløn fyri hvønn dag t.v.s. kr. 424,17.

B) Fyri manning mynstraða á fiskiskipum, sum ikki koma undir reglurnar undir punkt A) og minstaforvinning, verður hendan regla galdandi: Er fiskipartur, prísískoyti, minstaløn og manningarstudningur, samanlagt, minni enn kr. 591,36 fyri hvønn dag á túrinum, verður munurin goldin sum serlig viðbót."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. september 1990.

m.m.
Fabrikstrawlere på fiskeri efter sortmund
Ringnotskib
Industritrawlere
Fabrikstrawlere, som nedsalter eller fryser fangsten ombord
Fryseskib på fiskeri efter rejer eller muslinger
Skib på fiskeri efter laks

ydes med nuværende mindstefløn hver mand ekstra kr. 167,19 for hver påmønstret dag på turen. Dette tillæg mindsker med 28 ører for hver krone som fangstandel, incl. mindstefløn og mandskabsstøtte pr. dag overstiger gældende mindstefløn pr. dag dvs. kr. 424,17.

B) For mandskab påmønstret fiskeskibe, som ikke er omfattet af reglerne under punkt A) og mindsteindtægt gælder følgende regel: Hvis fangstandel, mindstefløn og mandskabsstøtte sammenlagt er mindre end kr. 591,36 pr. tur, betales differencen som særligt tillæg.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. september 1990.

Viðmerkingar:

Landsstýrið vil varðveita dagstudningsskipanina, sum síðani 1987 hevur verið ein táttur í ásetingunum av stuðninginum hjá Nevndini fyri Studningi til Fiskivinnuna. Av tí at løgtingslógin um studning til fiskivinnuna nú verður sett úr gildi, hevur landsstýrið valt at seta dagstudnirgsskipanina inn í lógina um minstuløn.

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður

/Kjartan Hoydal

Á l i t

f

løgtingsmáli nr. 141/1989: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

Málið er framlagt av landsstýringum tann 17. juli 1990 og eftir 1. viðgerð 19. juli beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. juli 1990 og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Sune Jacobsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Durhuus, Finnbogi Ísakson og Henrik Old) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til at gera broytingar í § 2, sum gera:

1. at dagstudningurin verður munurin millum vanliga dagløn (timaløn x 8 tímar) og dagminstaløn (mánaðar minstaløn : 30).
2. at upphæddin í § 1 punkt 3 verður sett til eina dagløn við 8 vanligum tímum eftir sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Meirilutin vísir annars til viðmerkingar sínar í álitið til løgtingsmál nr. 138/1989 og setir fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1 A gongur út í pkt. 1:
"kr. 167,19 fyri hvønn mynstraðan dag á túrinum" og í staðin verður sett:
"fyri hvønn mynstraðan dag á túrinum tað, sum

1) I § 1 A udgår i pkt. 1:
"kr. 167,19 for hver påmønstret dag på turen" og i stedet for indsættes:
"for hver mønstret dag på turen det som er forskellen mellem 8 sædvan-

er munurin millum 8 vanligar tímaløntir í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og 1/30 av mánaðarminstulønini".

2) Í § 1 A gongur út í pkt. 2: "t.v.s. kr. 424,17".

3) Í § 1 B gongur út: "kr. 591,36 fyri hvønn dag á túrinum" og í staðin verður sett:
"8 vanligar tímaløntir eftir tí í § 1 A, pkt. 1 nevnda sáttmála".

lige timelønninger i henhold til overenskomsten mellem Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og 1/30 af månedsminstelønnen".

2) I § 1 A udgår i pkt. 2: "d.v.s. kr. 424,17".

3) I § 1 B udgår:
"kr. 591,36 for hver dag på turen" og i stedet indsættes:
"8 sædvanlige timelønninger i henhold til den i § 1 A, pkt. 1 nævnte overenskomst".

Minniluti (Ernst Kass) mælir tinginum frá at samtykkja uppskot landsstýrisins. Víst verður annars til viðmerkingarnar í álitinum til løgtingsmál nr. 139/1989: Ráfiskabýti millum fiskavirkini.

FISKIVINNUNEVNDIN, 23. juli 1990.

Svend Aage Ellefsen | Sune Jacobsen | Jákup Lamhauge

Jógvan Durhuus | Finnbogi Ísakson | Henrik Old

Ernst Kass

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

17. juli 1990

F. L. j. nr.
(at tilskrivast í svari)

Tlf. 11080. Telex 81310 fingmi fo. Telefax 14942. Postboks 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. leygardag stongt

JM/pp

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 142/1989: Avtøka av ymsum løgtingslógum.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um avtøku av ymsum løgtingslógum.	lagtingslov om ophævelse af diverse lagtingslove.
§ 1. Hesar løgtingslógir fara úr gildi:	§ 1. Disse lagtingslove ophæves:
1) Løgtingslóg nr. 12 frá 12. januar 1950 um fiskavraking, sum broytt við løgtingslóg nr. 17 frá 14. apríl 1955, løgtingslóg nr. 62 frá 19. oktober 1961, løgtingslóg nr. 14 frá 29. mars 1963 og løgtingslóg nr. 24 frá 9. mai 1963.	1) Lagtingslov nr. 12 af 12. januar 1950 om fiskevragning, som ændret ved lagtingslov nr. 17 af 14. april 1955, lagtingslov nr. 62 af 19. oktober 1961, lagtingslov nr. 14 af 29. mars 1963 og lagtingslov nr. 24 af 9. mai 1963.
2) Løgtingslóg nr. 20 frá 27. januar 1950 um sildavraking, sum broytt við løgtingslóg nr. 41 frá 19. august 1952 og løgtingslóg nr. 13 frá 29. mars 1963.	2) Lagtingslov nr. 20 af 27. januar 1950 om sildevragning, som ændret ved lagtingslov nr. 41 af 19. august 1952 og lagtingslov nr. 13 af 29. marts 1963.
§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. september 1990.	§ 2. Denne lagtingslov træder

í kraft 1. september 1990.

Viðmerkingar:

Tann 3. apríl 1989 var fundur á Føroya Fiskasølu millum Nevndina fyri Ráfiskagrunnin, Ráfiskakeyparafelagið, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Vrakarastovnin og Føroya Fiskasølu. Á fudninum samdust partarnir m.a. um at heita á Føroya Landsstýri um sum skjótast at seta nýggjar reglur í verk í samband við innhandling av fiski, har dentur verður lagdur á fylgjandi:

1. Tað almenna eigur at taka seg aftur sum útinnandi partur í innhandlingini (t.e. góðskumeting) og skal hava meira yvirordnaðan leiklut.
2. Keyparin og seljarin skulu hava fulla ábyrgd av innhandlingini av feskum fiski og sostatt eisini av góðskuni á tí keypta fiskinum. Hetta vil motivera báðar partar í positivan rætning.

Flakavirkini hava arbeitt við innanhýsis góðskumeting í samband við bonus-skipanir og hevur landsstýrið stuðlað royndum hesum viðvíkjandi. Royndirnar vístu at stórir fyrimunir eru í, at virkið sjálvt hevur ábyrgdina av góðskuni.

Landsstýrið góðtók tilmælið frá fundinum 3. apríl, í prinsippinum, 11. mai 1989.

Hildið verður at tílík broyting eigur at fylgjast við broytingunum í prísáseting.

Lógaruppskotið setur úr gildi tær gomlu vrakaralógirnar frá 1950. Flestu av reglunum viðvíkjandi góðsku á feskfiski eru ikki lógarásettar, men eru settar við kunngerð við heimild í matvørulógini og arbeitt verður við teimum alla tíðina.

Vrakieftirlitsmennirnir fáa við hesi broyting ein annan leiklut og verða meira tilkallaðir til at taka avgerðir í ósemjum um

góðsku. Góðksumetarar og vrakarar verða hereftir beinleiðis knýttir av virkinum.

Olaf Olsen

landsstýrismaður

Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 143/1989: Løgtingslóg um avtøku av ymsum løgtingslógum.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 17. juli 1990 og eftir 1. viðgerð 19. juli beint í tiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 20. juli 1990 og hevur undir viðgerðini býtt seg í sin meirilutа og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Eliefsen, Sune Jacobsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Durhuus og Finnbogi Ísakson) tekur undir við at avtaka løgtingslóg nr. 12 frá 12. januar 1950 og løgtingslóg nr. 20 frá 27. januar 1950, báðar við seinni broytingum.

Hinvegin vísir meirilutin á, at vrakieftirlitsmennirnir eru tænastumenn og sostatt ikki uttan víðari kunnu sigast at starvi.

Meirilutin metir tað tí neyðugt við løgtingslóg at heimila landsstýrinum at áleggja teimum aðrar arbeiðsuppgávur og setir tí fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

Uppskot landsstýrisins

Sum nýtt stk. 2 í § 1 verður sett:

"Heimilað verður landsstýrinum at áleggja vrakieftirlitsmonnunum aðrar arbeiðsuppgávur".

Som nyt stk. 2 i § 1 tilføjes :

"Landsstyret bemyndiges til med denne lov at pålægge fiskevragningskontrollørerne andre arbejdsopgaver".

Ein minniluti (Henrik Old) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins. Minnilutin heldur, at hetta uppskotið er ikki til gagns fyri fiskimannin. Um broytingar skulu gerast, má hetta fara fram í samráð við nývalda fiskivinnuráðið.

Ein annar minniluti (Ernst Kass) mælir tinginum frá at samtykkja uppskot landsstýrisins. Víst verður annars til viðmerkingarnar í álitinum til løgtingsmál nr. 139/1989: Ráfiskabýti millum fiskavirkini.

FISKIVINNUNEVNDIN, 23. juli 1990.

Svend Aage Ellefsen | Suni Jacobsen | Jákup Lamhauge

Jógvan Durhuus | Finnbogi Ísakson | Henrik Old

Ernst Kass

Marita Petersen
løgtingslimur

F y r i s p u r n i n g u r

til

Signar Hansen, landsstýrismann í mentamálum

Løgtingsmál nr. 100-1/89: Viðvíkjandi reklamu í Sjónvarp Føroya.

I Í samband við, at landsstýrið hevur givið loyvi til at senda handilslýsingar - reklamu - í Sjónvarpi Føroya, verður landsstýrismaðurin í mentamálum spurdur, um landsstýrið hevur tryggjað sær, at handilslýsingarnar, ið sendar verða, ikki vera í stríð við endamálið fyri Sjónvarpi Føroya sambært løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982, har tað í § 1, 4. stk. stendur: "Sjónvarp Føroya hevur til endamáls at hava objektivan, sakligan og upplýsandi tíðindaflutning og sendingar annars, ið varðveita og fjálga um føroyska mentan, átrúnað og siðlæru."?

II Vil landsstýrismaðurin tryggja, at slíkt virksemi í Sjónvarpi Føroya, ið kann vera í stríð við nevndu lóg, ikki verður sett í verk, fyrrenn tingið hevur havt møguleika at viðgera málið?

Viðmerkingar:

Síðani Sjóvarp Føroya byrjaði sendingar sínar í 1982, hava lýsingar og kunngerðir ikki verið sendar. Men í 1988 samtykti sjónvarpsnevndin at mæla til, at Sjónvarp Føroya fær loyvi at senda kunngerðir/lýsingar, og uppskot til reglugerð fyri kunngerðir í Sjónvarpi Føroya varð 1. september 1988 sent landsstýrinum, ið góðkendi hetta 29. september 1988.

Í hesum uppskoti til reglugerð stendur einki um, hvat slag av lýsingum, ið loyvi skuldi gevast til. Men sum tað skilst, vóru øll samd um, at tað skuldu vera kunngerðir/ lýsingar á sama støði, sum Útvarp Føroya sendir.

Síðan tá hevur leiðslan heitt á landsstýrið um at geva loyvi til at senda handilslýsingar, t.v.s. reklamur í Sjónvarpi Føroya, og landsstýrið hevur givið hetta loyvið.

Grundgevingin fyri hesum er, at: "Sjónvarp Føroya roknar við, at tað verður sera trupult at skilja millum kunngerðir av upplýsandi slagi og handilslýsingar, ...

Tí verður hildið rættari at loyva handilslýsingum, men samstundis krevja, at tær eru á einum sakligum støði."

Í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp stendur í § 1, 4. stk.: "Sjónvarp Føroya hevur til endamáls at hava objektivan, sakligan og upplýsandi tíðindaflutning og sendingar annars, ið varðveita og fjálga um føroyska mentan, átrúnað og siðlæru."

Spurningurin er, um reklamur eru í tráð við hesa endamálsorðing. At royna at fáa fólk at keypa eitt slag av t.d. margarini heldur enn onnur sløg, ella at royna at fáa tey at keypa úr ávísum handlum og harvið keypa minni frá øðrum, er ikki objektivt, sakligt og upplýsandi og er heldur ikki at varðveita og fjálga um føroyska mentan, átrúnað og siðlæru.

Tað má metast ógvuliga ivasamt, um tað er lógarheimild fyri at loyva reklamu í Sjónvarpi Føroya.

Aðrir stórir spurningar í hesum sambandi eru: Skulu vit hava reklamu í Sjónvarpi Føroya? Um so er: Hví skulu vit hava tað, og hvørjar kunnu avleiðingarnar av hesum verða?

Tað skal ikki her takast støða til, um vit skulu loyva reklamusendingum, men grundirnar fyri at loyva reklamu kunnu vera fleiri, t.d.

a. at geva føroyskum handilsmonnum og fyritøkum møguleika at lýsa,
b. at geva Sjónvarp Føroya somu umstøður sum allar tær fremmandu sjónvarpsstøðirnar, ið føroyingar nú kunnu síggja,
c. geva Sjónvarpi Føroya fleiri inntøkur.

Leiðslan í sjónvarpinum tekur júst fram, at lýsingar-

nar - reklamurnar - fara at geva sjónvarpinum eina árliga inntøku upp á einar 3-4 mió. kr., og kunnu tær geva eitt gott ikast til raksturin, sum tikið verður til.

Tað er væl skiljandi, at leiðslan í sjónvarpinum roynir at fáa pening at arbeiða við, og tá ov lítið verður játtað, so er neyðugt at royna aðrar vegir.

Men tað, at lata ein part av rakstrinum fíggja við reklamupeningi, er ikki uttan avleiðingar. Hetta merkir, at eitt almont sjónvarp verður bundið av privatari figging, og tað kann eisini skjótt verða, at hesin privati peningur kemur at ávirka, hvat sent verður í tí almenna sjónvarpinum.

Hvussu Sjónvarp Føroya verður ført fyri at kappast við tær fremmandu sjónvarpsstøðirnar, vita vit einki um enn. Men eitt er vist: ávirkanin frá hesum støðum verður stór, og neyðugt verður at seta tiltøk í verk móti hesum, og tað gera vit ikki við at lata sjónvarpið fáa nakrar eyka krónur frá reklamu.

Vit noyðast frá almennari síðu at stuðla sjónvarpinum fíggjarliga, so tað verður ført fyri at gera nógvar og góðar føroyskar sendingar, og á tann hátt verða eitt veruligt alternativ til tær fremmandu støðirnar.

Av tí, at tað kann vera ivi um lógarheimildina at senda reklamu í Sjónvarpi Føroya, og av tí, at spurningurin um sjónvarpið er av stórum týdningi, er neyðugt, at tingið fær hesar spurningar til viðgerðar, og tí verður heitt á landsstýrið um at leggja málið fyri tingið sum skjótast.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. august 1989.

Marita Petersen

Signar Hansen
landsstýrismaður.

S v a r

uppá

fyrispurnig frá Maritu Petersen, løgtingslimi, í tingmáli nr. 100-1/89: Viðvikjandi reklamu í Sjónvarpi Føroya.

Fyrispurningurin er soljóðandi :

I. Í samband við, at Landsstýrið hevur givið loyvi til at senda handilslýsingar - reklamu - í Sjónvarpi Føroya, verður landsstýrismaðurin í mentamálum spurdur, um Landsstýrið hevur tryggjað sær, at handilslýsingarnar, ið sendar verða, ikki vera í stríð við endamálið fyri Sjónvarpi Føroya sambært løgtingslóg nr. 77 frá 21.mai 1982, har tað í § 1, 4.stk. stendur: "Sjónvarp Føroya hevur til endamáls at hava objektivan, sakligan og upplýsandi tíðindaflutning og sendingar annars, ið varveita og fjálga um føroyska mentan, átrúnað og siðlæru." ?

II Vil landsstýrismaðurin tryggja, at slíkt virksemi í Sjónvarpi Føroya, ið kann vera í stríð við nevndu lóg, ikki verður sett í verk, fyrr enn tingið hevur havt møguleika at viðgera málið ?

---

ad I

Sum tað verður sagt í viðmerkingunum til fyrispurningin, hevur sjónvarpsnevndin 1.september 1988 samtykt eitt uppskot til reglugerð fyri kunngerðir í Sjónvarpi Føroya. Tásitandi landsstýri góðkendi hetta uppskotið í óbroyttum líki á fundi 29.september 1988.

Í § 1 í reglugerðini verður sagt, at "Sjónvarp Føroya fer undir at senda kunngerðir/lýsingar við myndum, orðum ella tekstskermi."

Í frágreiðing, dagfest 24.januar 1989 greiðir Sjónvarp Føroya landsstýrinum frá, eftir hvørjum sjónarmiðum kunngerðirnar/-lýsingarnar verða sendar.

Í frágreiðingini varð m.a. sagt, at nágreinilig reglugerð, sum ásetir krøvini, ið lýsingarnar skulu lúka, verður gjørd. Eisini stendur í frágreiðingini, at gjørd verður reglugerð fyri teknisk krøv.

Í frágreiðingini viðmerkir Sjónvarp Føroya m.a., at tað verður sera trupult, at skilja í millum kunngerðir, ið eru upplýsandi, og handilslýsingar, ti ein mynd, búmerki ella tílíkt, sum verður vist á skerminum, er góð reklama, og neyvan ólepst undan fjaldum lýsingum í kunngerðunum.

Landsstýrið samtykti á fundi 31.mars 1989, at Sjónavarp Føroya kundi fara undir at senda kunngerðir/lýsingar sambært teimum sjónarmiðum, sum sjónvarpið nevnir í frágreiðingini frá 24.januar 1989.

Seinni hevur sjónvarpsnevndin viðtikið nágreiniliga reglugerð, sum ásetur krøvini, ið lýsingarnar skulu lúka.

Av tí, sum frammanfyri er greitt frá, sæst, at tað er Sjónvarp Føroya og við hesum eisini sjónvarpsnevndin, sum bæði hava tikið stig til at fara undir at senda kunngerðir/lýsingar og tikið støðu til innihaldið í hesum sendingum í Sjónvarpi Føroya.

Hetta er eisini í tráð við galdandi lóg og onnur fyrimæli viðvikjandi Sjónvarpi Føroya, nevniliga § 6 í løgtingslóg nr. 77 frá 21.mai 1982 um sjónvarp. Nevda regla sigur, at fyri Sjónvarpið verður lóg nr. 11 frá 14.februar 1957 um útvarpsnevnd : " sum hon er, og verður broytt at galda tilsvarandi; eins og reglugerð um starv útvarpsnevndarinnar. "

Í hesi seinast nevndu lóg og reglugerð er ásett í greinunum 1,

at løgtingið velur 5 limir í sjónvarpsnevndina.

Í greinunum 2 er ásett, at sjónvarpsnevndin skal ansa eftir, at tað, sum sent verður, hevur fjølbroytt, mentunarligt og upplýsandi innihald, og at hugsunarfrælsi, rættsinni og javnaður móti øllum flokkum og stevnum í almennum málum, vinnustovnum, faløgum og einstakum monnum skulu ráða í sjónvarpinum.

Við øðrum orðum áseta galdandi reglur, at tað er sjónvarpsnevndin, sum verður vald av løgtinginum, ið hevur ábyrgdina av tí, sum sent verður í sjónvarpinum. Hetta ber eisini í sær, at tað er sjónvarpsnevndin, ið skal ansa eftir, at Sjónvarp Føroya heldur seg til endamálsgreinina soleiðis, sum hon er ásett í § 1, 4.stk í løgtingslóg um sjónvarp : " At hava objektivan, sakligan og upplýsandi tíðindaflutning og sendingar annars, ið varðveita og fjálga um føroyska mentan, átrúnað og siðlæru."

Sum nevnt frammanfyri, hevur sjónvarpsnevndin tikið ella góðkent allar tær avgerðir, sum tiknar eru í spurninginum viðvíkjandi reklamu í Sjónvarpi Føroya. Tá sjónvarpsnevndin er beinleiðis vald av løgtinginum, hevur landsstýrið tá fatan, at løgtingið hevur staðið aftan fyri avgerðirnar og við hesum viðurkent, at hesar sendingarnar ikki ganga ímóti endamálinum hjá Sjónvarpi Føroya.

Eitt annað mál, sum eftir mínum tykki hevur samband við hetta mál, er loyvið, sum tásitandi landsstýri gav Tórshavnar Býráð til at taka sjónvarpssendingar niður frá fylgisveini og senda víðari loftvegis.

Sum kunnugt var hetta loyvið givið 22.apríl 1988 við heimild í §10, 3.stk. í løgtingslóg nr. 77 frá 21.mai 1982 um sjónvarp. Loyvið er galdandi í fyribils 2 ár frá tí degi, sendingarnar byrjaðu; tó gongur loyvið út 1.august 1990.

Sendingarnar hjá Tórshavnar Býráð hava nú verið at sæð í eina

tið og visa royndirnar, at ein fittur partur av tilfarinum, sum sent verður, eru lýsingar viðvikjandi vørum og tænastum.

ad. II

Landsstýrið vil á hesum øki, eins og á øllum øðrum økjum, vera við til at tryggja, at virksemi, sum gongur í móti lóggávuni, verður ikki sett í verk.

Á Føroya Løgtingi, 12.oktober 1989

Signar Hansen

Jákup Lindenskov
løgtingslimur

F y r i s p u r n i n g u r

til

løgmann

Løgtingsmál nr. 100-2/1989: Viðvíkjandi ávirkan av avgjaldshækkingum og vinningssteðgi hjá vanligu brúkarunum.

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið at seta í verk fyri at tryggja, at avgjaldshækkingarnar ikki koma at raka vanliga brúkaran harðari enn ætlað, vegna tess at vørurnar - sum longu er prógvað - dýrka nógv útyvir tað, sum avgjøldini sjálv bera í sær.

2. Landsstýrið sigur seg ætla vinningssteðg um nakrar mánaðar.

   Hvussu ætlar landsstýrið at afturføra prísleguna til tað, hon átti at verið um miðjan juli, tá avgjøldini vórðu samtykt.

3. Samgongan fer at seta úr gildi dýrtíðarvirðgerðina av lønum - og sum skilst helst eisini lønarsteðg. Ætlar samgongan at tryggja løntakarum eina serliga dýrtíðarábót - sum í minsta lagi veitir endurgjald fyri hesar órímuligu og óætlaðu príshækkingar áðrenn hesa avtøku av dýrtíðarskipanini.

Viðmerkingar:

Ongantíð áður er slíkur krónuniðurskurður samtyktur sum hesin, sitandi samgonga framdi í skattahækking, avgjaldhækking og príshækking. Tikið er so rivan til, at helst verða avleiðingarnar tær øvugtu av tí, samgongan ætlar.

Hetta tí kostnaðarlegan nækkar, bæði í framleiðsluvinnuni og viðvíkjandi almennu tænastuni.

So óavvegað tiltøk koma at minka virksemið so nógv, at arbeiðsloysi verður fylgjan. Harav verður minni útgjalding og tað í krónum nógv minkað í virði. Færri - ella minni verdar - skatta- og tollinntøkur koma so í landskassan, og samgongan má annaðhvørt læna meir uttanlands ella skerja almenna tænastustøðið út yvir tað rímuliga og sostatt forsvarliga.

Í hesi støðu tykist heilt høpisleyst, at samgongan drálar við at seta í verk vinningssteðg við heilt serligum heimildum til eina príseftirlitsskipan.

Orsøkin til, at slíkar serligar heimildir eru neyðugar, er sjálvandi, at royndirnar við vanligum vinningssteðgi eru vánaligar, og nú landsstýrið hevur skert játtanina til príseftirlitið so álvarsliga og hevur boðað frá størri skerjing næsta ár, er neyðugt at royna at fáa samgonguna til at rakna við, so hesin harðrendi og einvísi niðurskurður í lívsumstøðunum - livifóti - løntakarans verður linkaður.

Her er jú ikki talan um vanliga inntøkuhækking til landskassan, men eina rað av tiltøkum, sum seta borgaran ár aftur í tíðina, og tað bert til frama fyri eitt fátal av borgarum og feløgum, bankum og fyritøkum.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. august 1989.

Jákup Lindenskov

Jógvan Sundstein
lagmaður

SVAR

uppá

fyrispurning til lagmans

frá Jákupi Lindenskov, løgtingsmanni

Løgtingsmál nr. 100-2/1989: Tíðvíkjandi ávirkan av avgjalds-hækkingum og vinningsstøði hjá vanligu brúkarunum.

Jákup Lindenskov, løgtingsmaður, hevur sett mær hesar fyrispurningar:

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið at seta í verk fyri at tryggja, at avgjaldshækkingarnar ikki koma at raka vanliga brúkaran harðari enn ætlað, vegna tess at vørurnar - sum longu er prógvað - dýrka nógv ístyvir tað, sum avgjaldini sjálv bera í sær.

2. Landsstýrið sigur seg ætla vinningsstøðg um naktar mánaðir. Hvussu ætlar landsstýrið at føra prísleguna aftur á tað, hon átti at verið um miðjan juli, tá avgjaldini vórðu samtykt.

3. Samgongan fer at seta úr gildi dýrtíðarviðgerðina av lønum - og sum skilst helst eisini lønarstøðg. Ætlar samgongan at tryggja løntakarum eina serliga dýrtíðarábót - sum í minsta lagi veitir endurgjald fyri hesar ørimiliøu og óætlaðu prishækk ingar áðrenn hesa avtøku av dýrtíðarskipanini.

Áðrenn eg beinleiðis svari settu spurningunum, fari eg at gera nakrar viðmerkingar til tær viðmerkingar, sum løgtingsmaðurin letur fylgja við spurningunum.

Hann byrjar við at tala um tann stóra niðurskurð, sitandi samgonga hevur framt við skattahækking, avgjaldshækking og prishækking.

Fyrst av øllum skal viðmerkjast, at størsti krónuniðurskurðurin er framdur í tíðarskeiðinum 1985-1988 við stórum avgjaldshækkingum og sum fráleið samsvarandi hækkingum í útreiðslusíðuni á fíggjarlógini.

Viðvíkjandi teim lógum, sum samtyktar vóru í juli í ár, er at siga, at tann tvungna, bundna uppsparingin - sjálvt um hon í fyrsta umfari kennist sum skattauppkrav - ikki er skattur, men samansparing, sum verður afturgoldin á hendan hátt:

1. Tað, sum goldið er til landskassan í 1989, verður í 1992 goldið inn á pensiónskonto hjá skattgjaldaranum í føroyskum peningastovni og frígivið, tá viðkomandi fyllir 65 ár.

2. Tað, sum uppkravt verður í 1990 (og framyvir) verður beinleiðis sett inn á konto hjá viðkomandi skattaborgara í føroyskum peningarstovni til hægstu rentu. Kontoin verður frígivin í 1994 (og annars 4 ár eftir innbjaldingina). Verður ella er borgarin 65 ár, verður peningurin frígivin beinanvegin, skattaárið er úti.

Sostatt er her ikki talan um skatt, men um samansparing. Ein samansparing, sum sjálvt um hon er tvungin, verður til gagns fyri gjaldaran, og haraftrat verður samanlagda samansparingin til stórt gagn fyri føroyska samfelagið. Í hesum liggur eingin krónuniðurskurður, tvørturímóti.

Skattalógin er ikki broytt, og er tí eingin skattahækking framd.

Avgjaldshækkingin er framd fyri at útvega pening til landskassan. Hetta er tíverri neyðugt fyri at gjalda tær ovurhonds

stóru veðhaldsútreiðslurnar, sum landskassin hevur havt og fer at hava í eini 2-3 ár saman við stóru nýtsluni og meirnýtsluni í 1988 og tí halli, sum helst fer at vera í 1989.

Hesar avgjaldshækkingar eiga ikki at føra meiri prishækkingar við sær, enn neyðugt er av nýggju avgjaldunum. Um slíkar prishækkingar koma fyri, eisini áðrenn lógin um vinningsateðg kemur í gildi, skal Prísráðið kanna tær.

Saman við avgjaldshækkingum v.m. hevur samgongan eisini ætlanir um beinleiðis niðurskurð á komandi fíggjarlógum. Hetta verður gjørt fyri at minka um trýstið frá almenna økinum á samfelagið sum heild og harvið gera inntøkur landskassans minni neyðugar, tá núverandi meirnýtsla og hall eru afturgoldin. Ætlanirnar bera í sær ein møguleika fyri avlopi aftur í landskassanum, tá ið 1991 er farið.

Landsstýrið metir ikki, at tiltøkini eru óavvegað; men tvørturímóti heldur fara at gera javnvág aftur í føroyska búskapin um eini 2-3 ár. Tað er rætt, at ikki einans borgarin, men føroyska samfelagið sum heild verður sett nøkur ár aftur í tíðina. Men vit verða sett aftur í eina tíð, tá ið búskaparliga uppnitingin í sínni heild ikki hevði gjørt seg galdandi og fólk enn vóru varin í peninganýtsluni, aftur í ta tíð, tá ið gott arbeiði og arbeiðssemi vóru týdningarmiklir tættir í tilveruni. Landsstýrið vil gera, alt tað kann, fyri at fyribyrgja arbeiðsloysi, og um tað eydnast, so fær samfelagið aftur ta búskaparligu styrki, tað misti hesi seinastu árini.

Verða tiltøkini ikki framd, tí ov nógv verður lurtað eftir einvísu og tendensiøsu propaganda spyrjarans og hansara floks, fer samfelagið út av búskaparligu eggini, áðrenn langt um líður.

Svarini til teir einstøku spurningarnar oru hesi:

1. Landsstýrið leggur í heyst fyri tingið lógaruppskot um vinningsstoðg, t.v.s. at vinningurin fyri eina vøru ella tænastu, tá ið lógin kemur í gildi, hvørki í krónum ella prosentum kann fara upp um tað, hann var. Prísráðið skal umsita lógina.

2. Lógin um vinningsstøðg fevnir ikki um sjálva prísleguna, men vinningin. Um tað vísur seg, at ávísar vørur dýrka av avgjaldshækkingunum í juli meira enn avgjøldini og aðrar próvførdar dýrkingar, verða hesar prishækkingar at avtaka aftur.

3. Landsstýrið kemur í heyst við uppskoti um at avtaka prístalsviðgerðina av lønum. Harafturímóti kemur einki uppskot um lønarstøðg. Ætlanin er, at hendan lóg fær gildi innan 1. oktober 1989. Sostatt verða ikki fleiri dýrtíðarviðbøtur útgoldnar.

Sambært svarinum til 2. spurning skuldu ongar órímiligar ella óætlaðar prishækkingar komið fyri.

Lagt skal verða afturat, at landsstýrisins ætlan er at økja um peningastuðulin til Brúkarafelagið, fyri at bøta um uttanhýsis eftirlitið við prísum.

Á Føroya Løgtingi, 19. september 1989

Jógvan Sundstein
løgmaður

løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Jógvan I. Olsen, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-3/1989: Viðvíkjandi góðkenning av leigumálinum hjá Vaktar- og bjargingartænastuni vvir við Strond og at hon verður ikki verður tlutt úr Havnini.

Fyri kortum bar útvarpið tey tíðindi, at landsstýrið hevði samtykt at góðkenn. leigumálið hjá Vaktar- og bjargingartænastuni úti við Strond og verður lagt aftrat, at "við hesum eisini samtykt, at stovnurin verður ikki fluttur úr Havnini".

Mær tykir hesa nannagongd sera marghættliga, tað, at tengja uppí samtyktina um leigumálið, at "við hesum samtykt, at Vaktar- og bjargingartænastan ikki flutt úr Havnini".

Fyri mær er upplýst í landsstýrinum, at tað ongantíð er gjørd nøkur endalig samtykt, at stovnurin skal flytast úr Havnini, tí er tað lagið at nevna tað í hesum viðfangi.

Hinvegin fari eg at seta landsstýrismonninum hesar fyrispurningar:

1. Hvørjar eru orsakirnar til, at avgerðin soleiðis endurtikin, at hesin stovnur ikki kann verða fluttur úr Havnini, hagar tað eru betri havnaøki, bæði inni á landi, og tá tað snýr seg um sjálva atløgusíðuna til ávikavist skrivstovu, goymslu og skip.
2. Hevur landsstýrið kanna fíggjarligar fyrimunir at leggja stovnin møguliga í Klaksvík, sum talan hevur verið um, heldur enn at skotrast í ov trongum og ov dýrum øki.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. august 1989.

Jógvan við Keldu

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður.

S v a r

uppá .

fyrispurning frá Jógvani við Keldu, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-3/1989: Viðvíkjandi góðkenning av leigusáttmálanum hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni yviri við Strond og at hon verður ikki flutt úr Havnini.

Spurningarnir vóru soljóðandi:
1. Hvørjar eru orsøkirnar til, at avgerðin soleiðis endurtikin, at hesin stovnur ikki kann verða fluttur úr Havnini, hagar tað eru betri havnaøki, bæði inni á landi, og tá tað snýr seg um sjálva atløgusíðuna til ávikavist skrivstovu, goymslu og skip?
2. Hevur landsstýrið kannað fíggjarligar fyrimunir at leggja stovnin møguliga í Klaksvík, sum talan hevur verið um, heldur enn at skotrast í ov trongum og ov dýrum oki?

Vaktartænastan hevur regluliga reist spurningin um betri høliisumstoður í nógv ár. Í 1983 samtykti landsstýrið, at Vaktar- og Bjargingartænastan skuldi byggja saman við Fiskirannsóknarstovuni úti á Frælsinum.

Seinni hava fyrispurningar m.a. frá Klaksvíkar kommunu 12. mai 1986 verið um møguleikar at flyta Vaktar- og Bjargingartænastuna til Klaksvíkar.

M.a. orsakað av hesum gjørdi landsstýrið seinni av, at Vaktar- og Bjargingartænastan ikki skuldi vera uppií byggingini av nýggjari fiskirannsóknarstovu.

Hinvegin er ongantíð tikin nokur avgerð um, at Vaktar- og Bjargingartænatan skuldu flyta úr Havnini.

Landsstýrið hevur nú, fyri at loysa teir eygsýniligu høllstrupulleikarnar hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni, góðkent eitt leigumál úti við Strond í Havn.

Leigan fellur innan fyri tær reglur, sum landsstýrið hevur ásett fyri leigumál hjá tí almenna.

Við hesum metir landsstýrið at hava loyst høllstrupulleikarnar hjá einum almennum stovni á bíligasta og dyggasta hátt í løtuni.

Mint verður á, at løgtingið í vár álegði hesum stovni størri ábyrgdir innan fiskieftirlit og bjarging.

Á Føroya Løgtingi, 28. september 1989

Jógvan I. Olsen

Henrik Old
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Jógvan I. Olsen, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 130-4/1989: Viðvíkjandi nýtslu av kvotum til fiskiskip úr Suðuroy eins og onnur føroysk fiskiskip.

Kann landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum tryggja, at tey skip úr Suðuroy, sum í ár hava íslandsloyvi, fáa kvotur á hædd við onnur skip í landinum.

Viðmerkingar:

Í 1988 vóru samanlagt tillutað úr við 1300 tons av íslandskvotuni til skip í Suðuroy.

Í ár ser út til, at einans 600 tons av hesi kvotu eru tillutað skipum úr Suðuroy.

Okkurt skipið er í ár farið úr veiðu (kondemnerað), so rímuligt var, at tey eftirverandi fingu kvotu á hædd við onnur skip í landinum.

Hetta havur stóran týdning fyri skipini og manningarnar hesa árstíðina, og ikki minni fyri tey virki, hesi skip landa til.

Tí loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum í fiskivinnumálum soljóðandi fyrispurning.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. august 1989.

Henrik Old

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður.

S v a r

uppá

fyrispurning frá Henrik Old, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-4/1989: Viðvíkjandi trygging av kvotum til fiskiskip ur Suðuroy eins og onnur føroysk fiskiskip.

Fyrispurningurin var soljóðandi:
Kann landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum tryggja, at tey skip úr Suðuroy, sum í ár hava íslandsloyvi, fáa kvotur á hædd við onnur skip í landinum.

Til omanfyri nevnda spurning er svarið stutt og greitt ja. Landsstýrið roynir at fáa kvotur og veiðimoguleikar til skip í Suðuroy so frægar sum møguligt, eins og til skip aðrustaðni í landinum.

Íslandskvotan er einki undantak í so máta, hon hevur verið býtt millum tey skip og teir bátar, sum vanliga hava rikið hesa veiði. Línuskipini hava fingið ein part, snelluskipini ein part og ein minni nøgd er seinastu 3 árini sett av til kalva. Í 1986 lutaðu íslendingar okkum 8.500 tons til, í 1989 var hetta komið uppá 11.000 tons. Hesi tons vórðu býtt við 7.670 tonsum til línuskip, 3.630 tonsum til snelluskip og 245 tonsum til kalvabátar.

Línukvotan hevur verið fyrst og fremst býtt millum tey skip, sum hava rikið hesa veiði í nógv ár, og landsstýrið hevur lagt dent á, at tað ikki ber til at sleppa fleiri og fleiri skipum inn, tí tá verður so smábýtt, at eingin fer nakað burtuúr. Kalvabátarnir hava somuleiðis fingið bátakvotur, men snelluskipini hava fingið loyvi til ávist tóratal, innan teirra part av kvotuni.

Býtið hevur á hvørjum ári verið lagt fyri vinnuraelagini, samtakið Línuskip og Meginfelag Útróðrarmanna.

Í blaðskriving í hesum sambandi hevur serliga ein bátur verið nevndur, tað er "Saturn III" úr Vági, sum skal hava verið fyri vanbýti. Hann hevur eitt systurskip "Fuglfúgvan" á Eiði. Hesir bátar hava verið viðfarnir á akkurát sama hátt, men vert er at nevna, at bæði hesi skip komu í sonevnda "útróðrarpakkan" í 1986.

Fyri "Saturn III" fór út ein 20-tonsari, sum ikki hevði Íslandsloyvi, tá hann fór út, og fyri "Fuglfúgvuna" ein uppaftur minni bátur, sum heldur ikki hevði fiskað undir Íslandi.

Tá landsstýrið viðgjørdi hesi bæði útskiftingarmál, og eisini tá tílsøgnir um veðhald vórðu viðgjørdar í fíggjarnevndini, varð veiðigrundarlagið hjá "Saturn III" og "Fuglfúgvuni" gjølliga lýst og varð hetta vár og heystfiskiskapur undir Føroyum og fiskiskapur á djúpum vatni undir Føroyum um summarið. Einki varð gjørt um Ísland.

At skip verða kondemnerað er ein annar spurningur, og tá nógvar umsóknir koma frá einum stað, skapar hetta sjálvandi stórar trupulleikar.

Hinvegin kann tað neyvan heldur vera rætt, at landsstýrið játtar nógvan pening til umsøkjarar, sum vilja sleppa sær burtur úr fiskiflotanum og samstundis skal tryggja at teirra veiðimøguleikar verða varðveittir á sama plássi.

Í samband við tær kanningar, sum í løtuni fara fram í landsstýrinum um at broyta skipanina við uppheggingarstuðuli, verður eisini hugsað um spurningin um, at hetta ikki takar av tilvildarliga, so eitt pláss ella ein byggj missir av nógvar veiðimoguleikar.

Á Føroya Løgtingi, 13. september 1989

Jógvan I. Olsen
Jógvan I. Olsen

Niels Pauli Danielsen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Jóngerð Purkhús, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-6/89: Viðvíkjandi stabbunum til siglingarrennu í Haraldssundi.

Nær fer arbeiðið í gongd við at gera stabbarnar til siglingarrennuna í Haraldssundi?

Viðmerkingar:

Landsstýrið 1985-88 samtykti at gera siglingarrennu í Haraldssundi. Settur varð peningur av til hesa tvey fylgjandi ár, tilsamans 11 mió.kr. (6+5), og á galdandi fíggjarlóg fyri 1989 eru á játtanini til landsverkfrøðingin settar 3 mió.kr. afturat av til stabbar til siglingarrennuna.

Tá ið byrgingin varð gjørd um Haraldssund, varð lovað útróðrarmonnum, at renna skuldi vera í byrgingini soleiðis, at siglandi verður aftur í gjøgnum Haraldssund. Típpingin skerjir sum vera man møguleikarnar hjá útróðrinum norðanfyri almikið, og hetta er uttan iva ein av orsøkunum til ta stóru afturgongd í råvørunøgdini hjá tiakavirkjunum í Klaksvík. Kósavirkið fær t.d. triðingin minni av råvøru nú enn árið undan típpingini. Tá fekk virkið um 15.000 tons og fór niður á 9.000 árið eftir, tá ið sundið var tipt. Í fjør komu teir tí betur eitt lítið sindur upp aftur og fingu 10.000 tons.

Renna í gjøgnum Haraldssund hevur harumframt stóran týdning fyri vatnútskiftingina og minkar um dáikingina í hesum alioki, har fleiri nýggj alilogvi nú eru givin.

Undan seinasta løgtingsvali varð upplýst, at felag í Klaksvík var biðið um at fara undir arbeiðið at gera stabbarnar; fyrireikingar vórðu gjørdar Kunoyar megin, men so kom stígur í og enn røkist eitt fyri stabbunum. Tí verður hesin fyrispurningur settur avvarðandi landsstýrismanni.

Á FØROYA LØGTINGI, 5. september 1989

Niels Pauli Danielsen
løgtingsmaður

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður.

S v a r

uppá

fyrispurning frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-6/1989 viðvikjandi stabbunum til siglingarrennu í Haraldssundi.

Spurningurin var soljóðandi:

Nær er arbeiðið í gongd við at gera stabbarnar til siglingarrennu í Haraldssundi?

****

Undir viðgerðini av málinum um vegasambandið Klaksvík - Kunoyar legði landsstýrið frá 1985 - 1988 væl av arbeiði í at finna fram til frægastu loysnina, sum endaði við landsstýrissamtyktini frá 20. mars 1986, sum sigur, at gerast skal 10 m høg brúgv við 30 m siglingaropi niður á botn í sundinum, t.v.s. 15 m dýpi. Hetda var tá mett at kosta o.u. 50 mió. kr. við tí, sum er gjørt higartil.

Við atliti til landsins fíggjarstøðu í løtuni, sum eisini sæst á uppskoti landsstýrisins til fíggjarløgtingslóg fyri 1990, har játtanin til tunnils- og brúgvagerð er minkað niður í eina helvt í mun til árið fyri, er eitki, sum júst nú talar fyri at fara undir slíkar stórídøgur, ið eiga at verða gjørdar í einum, um rætt verður atborið.

Tá tað í spurninginum verður komið inn á, hvussu nógvur peningur er avsettur til hetta endamál árini frammanundan, má minnast á, at til gerð av tunnlum og brúm verður á hvørjum ári játtaður peningur í grunn, og fylgiskjølini til fíggjarløgtingslógina siga so hvørji arbeiði kunnu fíggjast úr grunninum. Sum flest ollum kunnugt, var bæði í 1987 og 1988 bygt fyri meira, enn tað, sum var tillutað grunninum, so eyðsæð er, at eingin fyrr játtaður peningur stendur tøkur, hvørki til hetta ella til onnur arbeiði, sum tá vóru nevnd í fylgiskjølunum til fíggjarløgtingslógina.

Umrødda landsstýrissamtykt frá 20. mars 1986 er ikki brotin og kann tí samanumtikið sigast, at arbeiðið við at gera stabbarnar til siglingarrennuna í Haraldssundi kann fara í gongd, tá hetta er fíggjarliga møguligt.

Á Føroya Løgtingi, 25. mai 1990

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

Páll Ellefsen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Jógvan I. Olsen, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-7/89: Viðvíkjandi uppheggingarstuðlinum.

1. Hvussu nógv fiskiskip hava fingið játtaðan uppheggingarstuðul?

2. Hvussu stór er samlaða upphæddin av teirri skuld, sum uppheggingarstuðul er játtaður av?

3. Hvussu stór var samlaða skuldin hjá tí av hesum fiskiskipum, sum skyldaði mest?

4. Hvussu nógv bruttoregistartons fevna hesi skipini um?

5. Hvussu nógv, býtt upp sum niðantyri nevnt, hava hesi skipini tiskað íalt í 1988 og 1987?
   a. Toskur og hýsa v.m. á grynri vatni.
   b. Hongafiskur og blálonga v.m. á djúpum vatni.
   c. Laksur.
   d. Fiskur, fiskaður í fremmandum sjógvi.

6. Í tann mun, tað eftir galdandi siðvenju innan umsitingina, kann láta seg gera, verður landsstýrismaðurin biðin um at upplýsa nøvn á skipum og eigarum, sum hava fingið uppheggingarstuðul.

Viðmerkingar:

Landsstýrið, sum sat áðrenn seinasta løgtingsval, har Føroya Javnaðarflokkur átti bæði løgmann og fiskimálaráðharran, játtaði upphøggingarstuðul til eini 14 fiskiskip.

Út frá tí, sum er komið alment fram, vórðu játtað 80% av teirri skuld, lánum og kreditorum v.m., sum vóru í skipunum.

Hesin peningur, sum játtaður er til upphøggingarstuðul, økir um landsins fíggjarløgtingslógir og skal í seinasta enda gjaldast av føroyska skattaborgaranum.

Tá tað m.a. tí má sigast at hava almennan áhuga, hvussu munagóð tiltøk eru fyri okkara fiskigrunnar og samfelagið sum heild, loyvi eg mær at seta fram omanfyri nevndu spurningar.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. oktober 1989.

Pauli Ellefsen

Jógvan I. Olsen,
Landsstýrismaður

Svar
upp á
fyrispurning frá
Paula Ellefsen, løgtingsmanni

Løgtingsmál nr. 100-7/1989: Viðvikjandi upphoggingarstuðlinum.

Pauli Ellefsen, løgtingsmaður hevur 2. oktober sett fram fyrispurning viðvikjandi upphoggingarstuðli. Spurningurin er liðaður sundur í 6 partar, sum verða svaraðir sohvort:

1. Hvussu nógv fiskiskip hava fingið játtaðan upphøggingarstuðul?

19 fiskifør hava fingið stuðul játtað eftir reglugerð nr. 27 frá 3. mai 1988 við seinni broytingum um stuðul til at fáa av stóra veiðiorku í føroyska fiskiflotanum burtur.

2. Hvussu stór er samlaða upphæddin av teirri skuld, sum upphøggingarstuðul er játtaður av?

Skuldin tilsamans, veðskuld og leysaskuldin var uml. 95 mió kr. Av hesum áttu figgjarstovnar uml. 12 mió, føroysku bankarnar (partvís við landskassaveðhaldi) 59 mió, Landskassin beinleiðis 10 mió, ognarir 13 mió og aðrir 1 mió.

3. Hvussu stór var samlaða skuldin hjá tí av hesum fiskiskipum, sum skyldaði mest?

Tað fiskifarið, sum hevði størst skuld var ein feskfiska-trolari, sum skyldaði 12,3 mió. Frá hesum skal so dragast søluvirði uml. 2,3 mió.

4. Hvussu nógv bruttoregistartons fevna hesi skipini um?

Fiskiførini telja tilsamans 1674 BRT.

5. Hvussu nógv, býtt upp sum niðanfyri nevnt, hava hesi skipini fiskað falt í 1988 og 1987?

a. Toskur og hýsa v.m. á grynri vatni
b. Kongafiskur og blálonga v.m á djúpum vatni
c. Laksur
d. Fiskur fiskaður í fremmandum sjógvi

Árini 1988 og 1987 geva nevvan nakra sanna mynd av tí veiðiorku talan er um. Longu í 1986 var upphøggingarmøguleikin borin upp á mál. Hetta í samband við at felog ynsktu at byggja nýggj fiskifør fyri gomul.. Landsstýrið bjóðaði tá hesum felogum, at tey kundu koma undir eina møguliga komandi upphøggingarskipan heldur enn at biðja um útskifting, sum tá vanliga varð játtað. Av hesi orsok vóru fleiri longu hálvavegna lagd frá 1987 og úteftir. Í viðgerðini vórðu nýtt tol frá fiskivinnuráðnum fyri, hvussu nógv umsøkjararnir við tí veiðiloyvi, teir áttu, hovdu veitt í vanligum rakstri. Út frá hesum hevði veiðan verið uml. 5000 tons av feskfiski á grunnum vatni, 90 tons av laksi og 1000 tons í Eysturssjónum.

6. Í tann mun, tað eftir galdandi siðvenju innan umsitingina, kann lata seg gera, verður landsstýrismaðurin biðin um at upplýsa nøvn á skipum og eigarum, sum hava fingið upphøggingarstuðul.

Tað verður ikki hildið at vera siðvenja at upplýsa nøvnini á teimum umsøkjarum, sum hava fingið stuðul, almennt á tingi. Hesir hava í góðari trúgv tikið av einum tilboði, sambært eini reglugerð, sum er góðkend í landsstýri og figgjarnevnd, og hava givið seg undir eina gjøgnumgongd av sínum viðurskiftum, sum teir mugu hava roknað við var millum landsstýrið og teir.

Talan er um 2 linubátar, 3 partrolarar - 2 omanfyri, hin undir 1000 hestar - , 9 útróðrarbátar, 3 laksabátar og 2 eysturssjóarbátar.

Á Føroya Løgtingi 22 februar 1990

Jógvan I. Olsen

Niels Pauli Danielsen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

løgmans

Løgtingsmál nr. 100-8/89: Viðvíkjandi flyting av almannalóggávuni til býa- og bygdaráð at umsita.

Hvat líður nevndini, ið sett varð á sumri 1986 til at koma við uppskoti um at flyta partar av almannalóggávuni til býa- og bygdaráð at umsita, og nær kann henda miðspjaðing fara í gongd?

Viðmerkingar:

Landsstýrið 1985-1989 arbeiddi nógv við miðspjaðing av almenna virkseminum á øllum økjum. Arbeiðseftirlitið og Líkningarráðið fingu deildir kring um í landinum, og Vaktar- og Bjargingartænastan fekk ikki loyvi til at byggja í Havn saman við Fiskirannsóknarstovuni, sum áður samtykt, tí landsstýrið hevði atlanir um at flyta Vaktar- og Bjargingartænastuna út úr Havnini. Hesum ætlanum man núverandi landsstýrið hava slept við at góðkenna leigumál úti við Strond í Havn.

Eisini á almannaøkinum varð í 1985-89 farið undir miðspjaðing, serliga við virkseminum hjá Andveikraverndini, og landsstýrið setti nevnd, ið beinleiðis varð biðin um at koma við uppskoti um, hvussu vit skulu flyta upp aftur større partar av almannalóggávuni til býa- og bygdaráð at umsita. Í hesi nevnd fingu Almannastovan, Føroya Kommunufelag, Tórshavnar kommuna og Sosialráðgevarafelag Føroya hvør sín lim.

Nú er liðin so mikið av tíð, at nevndararbeiðið skuldi verið komið væl áleiðis. Tí verður spurt, hvat líður, og nær vit kunnu vænta álit frá nevndini. Landsstýrið verður samtíðis spurt, um tað heldur fast við setningin hjá fyrra landsstýrinum um miðspjaðingina av almannalóggávuni til kommunurnar at umsita.

Á Føroya løgtingi, 3. oktober 1989

Niels Pauli Danielsen

Jógvan Sundstein
løgmaður

S v a r

uppá

fyrispurning frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-8/1989: Flyting av almannalóggávuni til býar- og bygdaráð at umsita.

Spurningurin var soljóðandi:

Hvat líður nevndini, ið sett varð a sumri 1986 til at koma við uppskoti um at flyta partar av almannalóggávuni til býar- og bygdaráð at umsita, og nær kann henda miðspjaðing fara i gongd?

Hin 11. juli 1986 sendi táverandi landsstýrismaður i almannamálum skriv til Almannastovuna, Tórshavnar kommunu og Føroya Kommunufelag og bað hesi um at velja hvør sin lim i ein arbeiðsbólk, sum kundi koma við ráðum og uppskoti um at flyta større ella minni partar av almannalóggávuni til býar- og bygdaráð at umsita.

Hin 29. januar 1987 setti landsstýrið arbeiðsbólkin; men seinni - i mars 1987 - varð ein limur frá Sosialráðgevarafelagnum settur afturat.

Tommy Petersen, almannastjóri, varð settur sum formaður fyri bólkin.

Bólkurin hevði sin fyrsta fund hin 17. mei 1987 og varð tá samtykt at leggja afturat arbeiðssetninginum:

"Bólkurin hevur skilt sína uppgávu soleiðis, fyrst at viðgera spurningin i sini heild og harnæst at koma við itøkiligum uppskoti um verkætlan a einum ella fleiri økjum, heldur enn frá byrjan at gera drúgvt nevndararbeiði, ið skuldi lagt eitt veruligt álit um spjaðing fram. Men kanska átti hetta at verið tikið upp til umhugsunar.

Bólkurin er samdur i, at størsti parturin av at vegleiða og stuðla einkultpersónar átti at kunna verið avgreiddur i nærumhvørvi viðskiftafólkanna.

Bólkurin er eisini samdur i, at hetta eigur at verða gjørt i smáum eftir umstøðunum i kommunum/kommunalu eindunum. Her verður eisini hugsað um at verja nærsamskifti viðskiftafólkanna i teim smáu heimligu eindunum."

Arbeiðsbólkurin hevur havt 9 fundir. Tann síðsti var hildin 24. august 1989 og er ætlanin at lata landsstýrismanninum i almannamálum (løgmanni) álit síðst i oktober mánaði 1989.

Landsstýrið fer tá at viðgera álitið og at taka støðu til spurningin um at lata almannaviðurskifti til kommunurnar at umsita.

Nágreiniliga skal ikki verða greitt frá landsstýrisins ætlanum á hesum øki, meðan bíðað verður eftir álitinum frá arbeiðsbólkinum. Kortini skal verða upplýst, at landsstýrið er sinnað at lata so nógv sum gjørligt av almannaskipanini út til kommunala umsiting. Fyritreytin verður, at kommunurnar eisini bera størri fíggjarliga ábyrgd av skipanini.

Á Føroya Løgtingi, 17. oktober 1989

Jógvan Sundstein
løgmaður

Niels Pauli Danielsen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

løgmann

Løgtingsmál nr. 100-9/1989: Viðvíkjandi skúlaviðurskiftunum í Vági.

Hví fylgir landsstýrið ikki úrslitinum av tænastumannakanningini um samarbeiðsviðurskiftini við Vágs skúla, niðurstøðuni hjá landsskúlaráðnum og løgfrøðingunum í Tinganesi?

Viðmerkingar:

Landsstýrið samtykti á fundi hin 11. september 1985 at seta í verk tænastumannakanning av viðurskiftum skúlastjórans og 13 lærarum, sum løgdu niður arbeiðið.

Allan Moltke-Hansen, dómarafulltrúi, varð útnevndur forhoyrsleiðari.

Tey fyrstu 3 skúlaárini, meðan kanningin fór fram, vóru lærararnir og skúlastjórin í starvi, og landsskúlafyrisitingin visti at siga frá, at skúlin gekk væl. Tað sama kom fram undir tænastumannakanningini. Tó varð skúlastjórin við skúlaársbyrjan 1988 knappliga suspenderaður og misti triðingin av løn síni. Hann fekk 2 dagar at taka upp eftir sær.

Mætir løgfrøðingar ivaðust tá, um tað var sambærligt við tænastumannalógini at fara inn í sak, sum var í gongd, tí at tað var at skúgva rættin til viks og gera niðurskurð, áðrenn sakin var liðug. Rættartrygdin varð tá søgd at vera í vanda.

Hin 20. apríl 1989 sendi Allan Moltke-Hansen, forhoyrsleiðari, landsstýrinum niðurstøðu sína, sum púra og

Landsskúlaráðið metir einki grundarlag vera fyri at loysa Jákup Olsen úr starvi.

Løgfrøðingar í landsstýrinum gjørdu eisini sína meting, sum er dagfest 18. juli 1989, og sum sigur: "at Jákup Olsen við støði í tænastumannakanningini ikki kann fáa ávaring, átalu ella sekt, ei heldur verða fluttur til annað arbeiðsstað ella loystur úr starvi. Náttúrligasta loysnin er tí, at suspensiónin av Jákupi Olsen verður sett úr gildi, og at hann byrjar aftur sum skúlastjóri 1. august 1989."

Tó samtykti landsstýrið á fundi hin 8. september 1989 at mæla kenslumálaráðnum til at loysa skúlastjóran úr starvi og lata teir 13 lærararnar, sum tænastumannakanningin sigur hava skuldina av samarbeiðstrupulleikunum, sleppa við einari átalu, ikki fyri samarbeiðstrupulleikar, men fyri at hava lagt arbeiðið niður í nakrar dagar.

Avgerð landsstýrisins hevur skelkað stóran part av fólkinum, og spurt verður, hvør meiningin er við kostnaðarmiklari rættarviðgerð, tá ið niðurstøðan ikki verður fylgd, men bara kveistrað til viks. Menn ivast í rættartrygdini her á landi, serliga í tænastu- og arbeiðsmannaviðurskiftum, og trúvirði myndugleikanna.

Tí loyvir undirritaði sær at seta løgmanni, sum hevur starvsfólkaviðurskifti undir sær í landsstýrinum, hesa spurning.

Á FØROYA ØGTINGI, 19. september 1989

Niels Pauli Danielsen

Jógvan Sundstein
løgmaður.

S v a r

uppá

fyrispurning frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-9/1989: Viðvíkjandi skúlaviðurskiftunum í Vági.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Hví fylgir landsstýrið ikki úrslitinum av tænastumannakanningini um samarbeiðsviðurskiftini við Vágs skúla, niðurstøðuni hjá landsskúlaráðnum og løgfrøðingunum í Tinganesi?

****

Landsstýrið hevur fylgt úrslitinum frá tænastumannakanningini við at avtaka suspensiónina av skúlastjóranum og veitt honum endurgjald og goldið honum lønarmissin.

Hetta er eisini í samsvar við tilmæli frá landsskúlaráðnum.

Haraftrat mælti landsskúlaráðið til, at "um samarbeiðstrupulleikarnir millum skúlastjóra, ein part av lærarunum og skúlamyndugleikarnar á staðnum eru orsøk til ófriðin í Vágs skúla, so mælir landsskúlaráðið til at loysa trupulleikarnar á ein hátt, sum tænir skúlanum og næmingunum best."

Hetta heldur landsstýrið seg hava gjørt við tess avgreiðslu av málinum.

Á Føroya Løgtingi, 7. november 1989

Jógvan Sundstein
løgmaður

Svend Aage Ellefsen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Ivan Johannesen, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-10/1989: Viðvikjandi skattafrælsi til ítróttarfeløg og av samsýningum til ítróttardómarar o.t.

1. Í hvønn mun er landsstýrið sinnað at medvirka, so ítróttarfeløg framhaldandi sleppa undan skattskyldu?

2. Er landsstýrið sinnað at útvega líkningarmyndugleikanum neyðuga heimild, so dómarasamsýningar o.t. gerast skattafrían?

Viðmerkingar.

að 1. Óneyðugt er í hesum viðmerkingum at útgreina, hvussu stóran samfelagsgagnligan týdning tað arbeiðið, sum gjørt verður innan ítróttarfeløgini kring landið, hevur.

Óneyðugt er væl saktans eisini at vísa á, at meginparturin av hesum arbeiði verður gjørt sjálvboðið og uttan samsýningar av nøkrum slagi.

Bæði tey, sum stíla fyri felaganna dagligu rakstri og tey, sum ferð eftir ferð traðka til, tá nakað leikar á, nýta alla ella stóran part av frítíð síni til arbeiði innan ítróttina.

Gaman í at landsmyndugleikarnir, og her undir landsstýri og løgting vegna skattgjaldaran sýna vælvild í játtaðum stuðuli bæði til íløgur og rakstur, - treyðugt so. Kortini má

tað standa heilt greitt, at tað er tann sjálvboðna og oftast ósamsýnta tænastan, sum heldur verkinum gangandi.

Nú man tað oftast vera soleiðis, at áhugin og viljin at stuðla er størstur, tá tað snýr seg um eitt hvørt støkkligt tiltak, ið fremjast skal t.d. eitt vøllur, sum gyrast skal inni, tá nakrir lutaseðlar skulu seljast, ein veitsla fyrireikast o.t., og mangan hevur tað vist seg truplari at fáa fólk at átaka sær ábyrgd, eitt nú sum nevndarlimur, dómari ella hjálpardómari til kappingar o.s.fr.

Serstakliga trupult hevur tað altíð verið at fingið fólk til tíggjarligu fyrisitingina, og óhugaligt man tað eisini mangan vera at stríðast við innkrevjan av limagjøldum, at fyrireika eyðnuhjól og bingospøl og at ganga biddaragongd frá "Pori til Pól" fyri at tóa javnvág í felagskassanum. Men higartil hevur arbeiðið kortini í flestu førum verið gjørt og tíðanbetur til lítar.

Ein uggi hevur tað eisini verið, at krøvini til roknskapin hava ikki verið størri enn, at eitt hvørt skilafólk hevur kunnað klárað uppgávuna so frægt, at roknskapurin kundi góðkennast á ársaðalfundinum. Soleiðis hevur verið til fyri kortum, men nú tykist tíanverri vend vera komin í eisini á hesum øki.

Tí fyri kortum hava at kalla øll ítróttarfeløg í landinum fingið boð um at senda inn ársroknskapir fyri seinnu árini til Likningarráð Føroya og haraftrat hava fleiri av teimum, sum standa á odda fyri feløgunum fingið týðuligar ábendingar um, at tað kann fáa óhepnar persónligar fylgjur fyri tey, um ikki boðini verðu fylgd.

Eygsýnt er, at hetta kennist ørkymlandi hjá teimum fólkum, sum framman undan mangan av lítlum huga hava átikið sær ábyrgdina av at halda skil á tíggjarviðurskiftunum hjá feløgunum.

Tað er rætt, at øll feløg sambært galdandi skattalógum eru skattskyldug. Hin vegin so er tað eisini heilt greitt, at landsstýrið hevur møguleikar at veita ítróttarfeløgum

skattafrælsi, um søkt verður um tað, so her skuldi verið sjálvsagt at rætt eina hjálpandi hond fram.

ad. 2. Sambært skattalógunum hava feløgini skyldu at senda inn roknskap til Líkningarráðið. Men um landsstýrið hinvegin veitir feløgunum skattafrælsi, gerst helst óneyðugt at senda inn roknskapin, og merkir hetta ein stóran lætta í arbeiðsbyrðuni hjá Líkningarraðnum, sum frammanundan helst er ovbyrjað við arbeiði.

Í hesum sambandinum skal eisini verða víst á, at líkningarráðið - so sum tey eisini eftir galdandi lógum hava skyldug til - rættiliga íðin hava lagt seg eftir at kanna, hvørt allar samsýningar til dómarar og hjálpardómarar eru fluttar yvir skattaskipanina ella ikki.

Men tá havt verður í huga, støddina á slíkum dómarasamsýningum má ein loyva sær at halda, at slíkt íðni er meira mæði enn føði hjá líkningardeildunum.

Nevnast kann t.d., at samsýningin fyri at døma ein hondbóltsdyst er fimti krónur, so ein ágreinilig rannsókn, hvørt samsýningin kemur til skattingar ella ikki, lønar seg neyvan peningaliga.

Kortini verður helst í nógvum førum goldið í hondina burtur av atgongupeninginum.

Skilabest hevði tí verið, at landsstýrið legði fyri løgtingið uppskot um broyting í skattalógini, so dómara- og hjálpardómarasamsýningar gjørdust skattafríar.

Samsvarandi hesum viðmerkingum loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum frammanfyri standandi fyrispurningar.

Á FØROYA LØGTINGI 26. oktober 1989.

Svend Aage Ellefsen

Ivan Johannesen
landsstýrismaður.

S v a r

uppá

fyrispurning frá Svend Åge Ellefsen, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-10/1989 viðvíkjandi skatting av ítróttarfeløgum.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1) Í hvønn mun er landsstýrið sinnað at medvirka, so ítróttarfeløg framhaldandi sleppa undan skattskyldu?

2) Er landsstýrið sinnað at útvega líkningarmyndugleikanum neyðuga heimild, sum dómarasamsýningar o.t. gerast skattafrían?

****

Að 1): Sambært § 3, stk. 3 í skattalógini hevur landsstýrið heimild at geva feløgum skattafrælsi, um so er, at inntøkan eftir stovnanarskipan, lógum ella samtyktum teirra einans skal verða nýtt til almenn góðgerðin ella kirkjulig, mannagóð, listarlig, vísindalig ella tílík endamál. Áðrenn avgerð er tikin, fær landsstýrið sær álit í málinum frá bygdarráðnum, sum málið kemur við.

Á fundi millum Føroya Landsstýri, Líkningarráð Føroya og Í.S.F. er avtalað, at Føroya Landsstýri og Líkningarráð Føroya gera eitt vegleiðandi skriv til feløgini, sum tey kunnu søkja um skattafrælsi eftir. Arbeitt hevur verið við hesum skrivi og verður tað liðugt í næstum.

Að 2): Føroya Landsstýri ásannar týdningin av tí sjálvboðna arbeiðinum, ið gjørt verður í samband við ítróttina, og landsstýrið er tí eisini sinnað at hjálpa ítróttinum á hesum øki. Landsstýrið heldur tó ikki, at tað er rætt at gera ávís inntøkusløg skattafrí, tí hetta kann fara at verða brúkt sum grundarlag fyri skattafrælsi á nógvum øðrum økjum. Men landsstýrið hevur á fundi við Í.S.F. lovað at virka fyri at stuðla ítróttini og hevur hin 13. desember 1989 í skrivi mælt fíggjarnevndini til at seta 600.000 kr. av á fíggjarlógini 1990 til at bera ítróttini nakað aftur av tí peningi, ítróttin rindar í skatti, og hevur skotið upp at Líkningarráð Føroya skal umsita henda stuðul.

Fíggjarnevndin hevur hin 3. apríl 1990 sagt frá, at hon hevur samtykt at játta umbidna eykastuðul uppá 600.000 kr. á fíggjarlógini 1990.

Á fundinum millum Føroya Landsstýri, Líkningarráð Føroya og Í.S.F. gjørdi landsstýrið vart við, at tað er ein sannroynd, at ein partur av ítróttini er vorðin eitt yrki. T.d. koma á hvørjum ári fleiri útlendskir venjarar til landið. Tað er tí eisini av týdningi, at skattavaldið hevur eftirlit við, at lønirnar frá

hesum virksemi koma til skattingar.

Men nøkur ítróttarfeløg eru, sum hava noktað at lata roknskap inn til líkningarvaldið.

Ein avgjørd treyt fyri, at landsstýrið kann stuðla ítróttini, er, at ítróttarfeløgini halda galdandi lógir, og tí hevur Føroya Landsstýri heitt á Í.S.F. um at minna øll ítróttarfeløg í landinum á, at allar lønir eiga at verða goldnar um afturhaldsskipanina, fyri at skattur kann verða roknaður av lønini, áðrenn hon verður goldin.

Á Føroya Løgtingi, 2. mai 1990

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

Jákup Lindenskov
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Jóngerð Purkhús, landsstýrismann.

Løgtingsmál nr. 100 11/1989: Um landsstýrið ætlar at steðga ólógligu umfarinum og sølu av rúsdrekka í Føroyum.

Hevur landsstýrið ætlanir um at steðga ólógligu umfarinum og sølunni av rúsdrekka í Føroyum?

Um landsstýrið framvegis er maktarloyst, eru so ætlanir um at seta fram uppskot um rúsdrekkaeinkarsølu.

Viðmerkingar:

Í 1973 setti táverandi landsstýri fram uppskot um einahandil við rúsdrekka.

Uppskotið varð samtykt av løgtinginum, men seinri vrakað við fólkaatkvøðu, men ólógligu viðurskiftini steðgaðu ikki.

Allir tingflokkar hava síðani tá havt medábyrgd av landsins stýri, men eingi evni at fáa lóg og landaskil á hesum eki. Øll tekin prógva, at evnini hjá myndugleikunum at hondheva galdandi lógarfyriskipan eru púra eingi.

Á FØROYA LØGTINGI, 25. oktober 1989.

Jákup Lindenskov

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður.

S v a r

uppá

fyrispurning frá Jákup Lindenskov, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-11/1989 um landsstýrið ætlar at steðga ólógliga umfarinum og sølu av rúsdrekka í Føroyum.

Spurningurin var soljóðandi:

Hevur landsstýrið ætlanir um at steðg ólógliga umfarinum og sølu av rúsdrekka í Føroyum?

Um landsstýrið framvegis er maktarleyst, eru so ætlanir um at seta fram uppskot um rúsdrekkaeinkarsølu?

****

Spyrjarin ásannar, at ólógligt umfar og søla av rúsdrekka fer fram í Føroyum, og ger hann helst hetta út frá tí vitan, hann hevur um málið. Jákup Lindenskov hevur arbeitt nógv við hesum evni, og sum landsstýrismaður umsitið rúsdrekkamálið í nógv ár.

Um landsstýrið ikki skuldi maktað at steðga ólógligu søluni og umfarinum av rúsdrekka, gongur spyrjarin út frá, at so er einki annað at gera, enn at stovna eina rúsdrekkaeinkarsølu, og spyr um landsstýrið ætlar at stovna eina tílíka.

Undirritaða metir ikki, at tað verður til stóra hjálp bert at stovna eina rúsdrekkaeinkarsølu, men at tað er neyðugt at fáa rúsdrekkaskipanina nútímansgjørda á fleiri økjum.

Nú umsiti eg málsøkið í landsstýrinum, og eg havi arbeitt við ymsum uppskotum til broytingar í rúsdrekkaskipanini, m.a. um loyvi til at borðreiða við víni og øli aftanvið máltíðum á gistingarhúsum og matstovum og at geva postverkinum loyvi til sølu (ikki einkarsølu) av rúsdrekka. Hetta vildi helst minkað nakað um ólógligu søluna og umfarið av rúsdrekka og innkeypini frá útlandinum av øv stórum nøgdum av rúsdrekka um ferðina.

Í løtuni arbeiði eg víðari við málinum.

Á Føroya Løgtingi, 25. mai 1990

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

Niels Pauli Danielsen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Jógvan I. Olsen, landsstýrismann.

Løgtingsmál nr. 100-12/1989: Um føroyska fiskiveiði á Flemish Cap.

Hvat ger landsstýrið fyri, at føroysku skipini aftur sleppa at fiska á Flemish Cap, og hvat ger landsstýrið fyri at hjálpa teimum skipunum, ið eru rakt av tí frívilluga veiðisteðginum og nú eru illa fyri fíggjarliga?

Viðmerkingar:

Frívilluga friðingin á Flemish Cap fyri tveimum árum síðani kom sera illa við hjá saltfiskalínuskipunum, sum tríliga høvdu roynt á hesum leiðum í nógv ár.

Hetta var eisini landsstýrinum kunnugt, og tí vórðu alternativir møguleikar fyri hesi skip havdir á lofti, sum tíverri hava ikki vist seg at verið til serliga stórt gagn fyri skipini. Fleiri av hesum skipum liggja nú við bryggju í Klaksvík og hava ligið leingi uttan at vita sær nakrar møguleikar.

Friðingin varð ætlað fyri 1988 og varð seinni samtykt eisini at galda fyri 1989, og nú á seinasta NAFO-fundi í Bruxelles varð samtykt, at friðingin skal halda fram í 1990 eisini.

Tað hevur ljóðað, at aðrir fiska á nevndu leiðum og hava fiska alla tíðina, meðan føroyingar hava givið sær sjálvum fiskibann, og at EF nú hevur mótmælt seinastu samtyktini hjá NAFO.

Kann tað hugsast, at landsstýrið eisini mótmælir, og hvørjar avleiðingar fær eitt møguligt mótmæli fyri fiskiskap okkara í kanadiskum sjógvi.

Á FØROYA LØGTINGI, 31. oktober 1989.

Niels Pauli Danielsen

Jógvan I. Olsen,
Landsstýrismaður

Svar
upp á
fyrispurning frá
Niels Pauli Danielsen, løgtingsmanni

Løgtingsmál nr. 100-12/1989: Um føroyska fiskiveiði á Flemish Cap.

Niels Pauli Danielsen, løgtingsmaður hevur sett fram fyrispurning um hvat landsstýrið ger fyri at føroysku fiskiskipini aftur sleppa at fiska á Flemish Cap. Áðrenn sagt verður frá hesum er neyðugt at siga eitt sindur um tey viðurskifti, sum førdi til, at Føroyar løgdu fram uppskot um at friða Flemish Cap.

Broyttu viðurskiftini vestanfyri
Eftir at 200 fjórðinga markið kom í gildi vestanfyri broyttist fiskiskapurin munandi. Teir stóru fiskiflotarnir úr Europu, serliga Spania og Portugal, sum í eini 400 ár høvdu dúvað upp á Grand Bank, Stóra Banka á Newfoundlandsleiðini, noyddust at søkja sær nýggjar leiðir. Teir áttu nú at kalla bert eina avmarkaða leið á "halanum" á Stóra Banka (Tail of the Bank) og "nøsini" á bankanum. Hetta var tað sum lá eftir í altjóða sjógvi - og so Flemish Cap. Fiskiskapurin uttan fyri 200 fjórðingar er reguleraður í NAFO felagsskapinum, har Føroyar saman við Grønlandi eru limir undir heitinum Danmark (vegna Føroyar og Grønland).

Spania gjørdist ongantið limur í NAFO og fiskaði at kalla óregulerað inntil landið gjørdist limur í felagsmarknaðinum. Portugal var limur í NAFO, men gjørdi ikki nógv við at hava eftirlit við veiði sini á Flemish Cap. Tá so harattrat spanskt partrolaraflotin legðist á Flemish Cap, so kom toskurin á Flemish Cap undir sera hart trýst. Í 1986 og 1987 var stovnurin so niður undirkomin, at føroysk skip ikki fóru alla komu heim við hálvum túri alla minni, túrur fekst púra einfalt ikki vestanfyri. Borðoyarnes kom í desember 1985 heim við 370 tonsum av saltfiski. Nøkur hagtøl teimum trimum stóru Flemish Cap línuskipunum viðvíkjandi sýna gongdina í 1986 og 1987.

Landingar, í saltfiski:

Ár	Sigurfarið veiðitið	tons	Hans Erik veiðitið	tons	Borðoyarnes veiðitið	tons
1986						
	30/1-13/6	203	/2-/6	239	22/1-16/6	213
	/7-/12	186	18/9-28/12	194	30/7-19/11	166
1987						
	1/3-1/5	16	-		4/1-9/5	102
	3/6-5/11	114	/6-/12	146	9/7-12/11	109

Hin møguleikin vestanfyri, toskakvotan við Labrador sum Føroyar fáa frá Canada sveik, á sama hátt hesi árini. Landsstýrið metti tí, at einasti møguleikin at fáa Flemish Cap á fætur aftur, var at skjóta upp at toskafiskiskapur varð heilt bannaður í 1988. Bert á hendan hátt kundi trygd fáast fyri, at spanska armadain ikki fiskaði fritt á Flemish Cap. Hetta varð goðtikið av vinnuni.

Flemish Cap er altjóða oki. Limalondini í NAFO mugu sjálvi hava eftirlit hvørt sær við fiskiskapinum, og t.d. kunnu Føroyar senda vaktarskip yvir á Flemish Cap um áhugi er fyri tí. Fólk frá Vaktar- og Bjargingartænastuni hava onkuntíð verið við canadiskum eftirlitsskipum á leiðini. Canadiarar flúgva tó regluliga yvir bankanum og telja fiskifør. Eftir teirra tølum verður bannið ikki hildið 100 %, men talið av spønskum og serliga portugisiskum skipum er minkað og tey skip,sum annars trároyndu Flemish Cap, hava lagt seg eftir at fiska flatfisk uttan fyri canadiska markið suðri á Stóra Banka og hevur hetta elvt til stórar trupuleikar hjá canadiskum fiskimonnum.

Metingin er sostatt, at bannið, sum varð samtykt fyri 1988 og endurnýggjað í 1989 hevur um ikki friða bankan minkað munandi um veiðitrýstið og at toskurin hevur fingið betri frið. Í hagtølum, sum vórðu løgd fram á NAFO fundi í september 1989 um hvussu nógv skip vóru tikin av eftirlitinum á Flemish Cap í 1988 kom tað eisini greitt fram, at EF nú ger álvara av at hava eftirlit við sínum egnu og yvir 10 skip vóru tikin og drigin fyri rættin í heimlandinum og fingið bót.

Ársfundurin hjá NAFO 1989

Á ársfundinum í NAFO september 1989 legði føroyska sendinevndin nógva orku í at fáa avtikið bannið á Flemish Cap í 1990. Grundgevingin var, at tann flotin sum vanliga hevði fiskað á Flemish Cap fór í søguna um eingir møguleikar vórðu í 1990. Metingin frá fiskifrøðingunum var at ein góður árgangur, 1986, var á veg, men hann átti at fáa frið til 1991. Tað varð beinanveg greitt, at meiriluti fekst ikki fyri at avtaka bannið, men hinvegin søgdu flestu lond seg at skilja støðuna hjá Føroyum og

vilja royna at finna eina loysn okkara vegna. Tær báðar loysnirnar, sum verða skotnar upp fingu tó so harða mótstøðu frá einum parti, EF, at tær ikki hevdu tjans at verða samtyktar av einum meiriluta.

Einasti leið, sum er eftir, um Føroyar fritt skulu kunna fiska á Flemish Cap í 1990, er at nýta tann møguleika, sum er fyri at mótmæla eini samtykt og á tann hátt gera seg leysan av henni. Landsstýrið fekk fráboðan um samtyktina um toskabannið á Flemish Cap frá høvuðsskrivstovuni hjá NAFO í brævi dagsett 13. oktober og eitt møguligt mótmæli skal eftir reglunum vera NAFO í hendi aftur seinast 60 dagar eftir 13. oktober t.e. 12. desember.

Um Føroyar mótmæla so kunnu hini limalondini eisini siga seg leys av banninum, og sostatt verður friur fiskiskapur aftur á Flemish Cap. Tað er væntandi, at Spania (sum innanhýsis í EF hevur mótmælt banninum á Flemish Cap harðliga) sendir alla armadaina inn aftur á Flemish Cap.

Tað er rætt, at EF hevur motmælt fleiri samtyktum í NAFO, tó ikki samtyktina um Flemish Cap. EF byrjaði at nýta mótmælismøguleikan, uttan mátahald, í 1985. Hetta var eitt fullkomið hamskifti frá tí samráðingarhátti EF hevði havt áðrenn. Hett var tá, at hetta umskiftið kom í, tí sponsk áhugamál fingu mest týdning hjá EF vestanfyri.

Úrslitið av hesum mótmælispolitikki hevur verið, at EF hevur mist øll fiskirættindi í canadiskum sjógvi. EF hevði rættuliga stór rættindi á Stóra Banka umframt annað. Eingin fiskivinnusáttmáli er í dag millum Canada og EF og skip úr EF sleppa ikki at nýta canadiskar havnar uttan í neyðsstøðu.

Hóast canadiarar skilja føroysku trupuleikarnar á Flemish Cap sera væl og samstarvið á fiskivinnuøkinum við canadiskar myndugleikar er gott, so visir dømið við EF hvussu stóran dent Canada leggur á samstarvið í NAFO og at NAFO avgerðir verða fylgdar. Tað má tí metast, at leggju Føroyar størst dent á møguleikarnar á Flemish Cap so kunnu avleiðingarnar vera, at kvoturnar av svartkalva (4000 tons) og toski við Labrador (2250 tons), joint venture avtalur um rækjur umframt annað samstarv á fiskivinnuøkinum, sum er komið í seinastu árini, eru í vanda. Tá ein so máttmikil samgonga sum EF verður so harðliga hartað, so formáa Føroyar sær neyvan stórt.

Undir NAFO-sáttmálanum hava Føroyar helst møguleika at hava eitt línuskip á royndarveiðu á Flemish Cap í 1989. Fiskirannsóknarstovan arbeiðir við einum uppskoti fyri royndarfiskiskapi fyri einum skipi í 1990.

Royndir at stuðla Flemish Cap skipunum.

Landsstýrið hevur havt nógvar fundir við tey reiðarí, sum fiska á Flemish Cap. Landsstyrið bjóðaði m.a.í januar 1988 at stuðla umbygging við trystilasc, so at hesi skipini fingu øktar

virkismøguleikar t.d. úr svartkalva. Tvey av skipunum fingu stuðul til at fara oysturoftir tíðliga í 1988 og eisini til at gera kalvatúr vestureftir. Eitt skip fekk eitt royndarloyvi at gera ávist tal av setum á Flemish Cap juli til november 1988 í samband við annan fiskiskap vestanfyri. Tosað hevur eisini verið við Canada um at sleppa at fiska sonevndu "others" kvotuna av toski á halanum á Stóra Banka innan fyri canadiskt mark og avvísa teir ikki hesum.

27 apríl 1989 bjóðaði landsstýrið sær til at leiga tvey av skipunum í 4 mánaðir til royndarfiskiskap á djúpum vatni. Eisini vóru hesi skip uppi í tá samband var við Grønland um møguleikar at taka móti fiski frá grønlendskum bátum. Landsstýrið kannar í løtuni enn møguleikan at fáa føroysk línuskip inn í Grønlandi. Fundur er avtalaður við Kaj Egede tá verkfallið er tv.

Landsstýrið hevur ikki endaliga avgjørt um mótmælast skal hjá NAFO.

Landsstýrið hevur tá prinsippstøðu, at vit eiga at royna at varðveita so fjølbroyttar møguleikar sum gjørligt á fjarleiðum - eisini á Flemish Cap. Bann fyri veiði er altið ein ring loysn, men hetta eigur at verða samanborið við framhaldi av støðuni á Flemish Cap í 1986 og 1987, har veiðan var burtur av vánalig og ikki var før fyri at geva eitt tiggjarligt grundarlag fyri framhaldandi fiskiskapi á Flemish Cap hjá teimum skipum, sum vanliga hava rikið hendan fiskiskap.

Á Føroya Løgtingi novembur 1989

Jógvan I. Olsen

Óli Breckmann
Løgtingsmenn

F y r i s p u r n i n g u r

til

Jóngerð Purkhús, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-13/1989: Viðvíkjandi harðari revsingum til rúsevnissmuglarar.

Hevur landsstýrið ætlanir um at fáa hert revsitiltøkini mótvegis teimum, sum smugla til Føroya hash og onnur rúsevni og fyri at nýta og/ella selja.

Viðmerkingar:

Títtari og títtari hoyrist í fjølmiðlunum um fólk, sum verða avdúkað og tikin, tá tey smugla hash og onnur rúsevni inn í landið.

Dagligt er nú eisini at lesa og hoyra tíðindi um ungfólk, ið tikin eru við slíkum uppi á sær.

Eyðsýnt er, at lógbrótarar vinna sær pening í ólógligum handli við hesum, og tað má steðgast!

Verða tíðindi um rúsevni á henda hátt hvønndagstíðindi, kámast skjótt kenslan millum manna um tann ómetaliga vanda bæði fyri likam og sál, ungfólk okkara er statt í.

Øll eru vit ivaleyst samd um, at her má byrgjast fyri í stundini.

Nú hevur nóg leingi verið tosað um, at okkurt má gerast her hjá okkum, skal ikki størskaði spyrjast burturúr. Tíðin er nú avgjørt komin at herða revsitiltøkini dyggiliga móti teimum, sum við søluvinningi vilja gera sær dælt av annara vesældømi. Eftirlæti móti brotsmonnum á hesum øki, sum á so mongum øðrum, tá um rættarrevsing ræður, má verða avloyst av harðari lóggávu og strangari revsing. Tí ikki er nóg mikið, at hitt almenna og onnur av øllum álvi royna at fyribyrgja heilsuniðurbrótandi misnýtslu við upplýsing og viðgerð.

Samsvarandi hesum viðmerkingum loyva vit okkum at seta fram hendan spurning.

Á FØROYA LØGTINGI, 3. november 1989.

Svend Aage Ellefsen Óli Breckmann

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður.

S v a r

uppá

fyrispurning frá løgtingsmonnunum Svend Aage Ellefsen og Óla Breckmann í tingmáli nr. 100-13/1989 viðvíkjandi harðari revsingum til rúsevnissmuglarar.

Spurningurin var soljóðandi:

Hevur landsstýrið ætlanir um at fáa hert revsitiltakini mótvegis teimum, sum smugla til Føroya hash og onnur rúsevni og fyri at nýta og/ella selja?

****

Sum øllum kunnugt eru okkara lógir á hesum oki danskar. Galdandi lóggáva heimilar revsing við bót, hefti ella fongsli upp til 2 ár. Álvarsligari brot kunnu smb. revsilógini revsast við fongsli upp til 10 ár.

Hvussu dømt verður í hvørjum einstøkum revsimáli er í okkara rættarsamfelag latið upp í hendurnar á dómsvaldinum.

Galdandi revsiramman skuldi sostatt givið møguleika fyri teimum revsingum, sum mugu ætlast at vera neyðugar í hvørjum einstøkum føri.

Viðmerkjast kann, at sambært rættarsiðvenju verður strangari revsins dømd fyri slík lógarbrot í Føroyum enn í Danmark.

Nú fyri stuttum staðfesti Eystari Landsrættur tveir tílíkar dómar.

Landsstýrið leggur á hesum økinum stóran dent á upplýsandi og fyribyrgjandi arbeiði. Somuleiðis kann landsstýrið, við t.d. at veita tollvaldinum og løgregluni fíggjarligan stuðul, bøta um møguleikarnar at finna fram til møguligar lógbrótarar.

Á Føroya Løgtingi, 25. mai 1990

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

Niels Pauli Danielsen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Jógvan Purkhús, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100 14/99: Viðvíkjandi ferðasambandunum beinleiðis millum Klaksvík og Tórshavn og ferðasambandinum um Leirvíksfjørð.

Kann landsstýrismaðurin í samferðslumálum vátta, at dagliga beinleiðis siglingin millum Klaksvík og Tórshavn morgun og kvøld haldur fram eisini í vetur, og at ferðasambandið við "Teistan" um Leirvíksfjørð verður eisini seint um kvøldið, og at ferðaseðlaprísurin ikki hækkar?

Viðmerkingar:

Landsstýrið 1985-88 fekk uppaftur tikið gamla ferðasambandið sjóvegis úr Klaksvík til Tórshavnar við at seta "Teistan" inn í dagliga sigling mongun og kvøld fyri arbeiðstíð og eftir arbeiðstíð. Hetta kom av verða ein rúta, sum alt fleiri og fleiri royndu og tóku undir við, sjálvt um hon var óstøðug, tí at skapið so ofta varð tikið úr rutu, tá ið neyðugt varð við tí ørumsbáti.

Skjótt gjørdist greitt, at tarmafluthringurin til og úr Norðoyggjum hevur hesa rutuna fyri neyðini, og at tað samsama ger seg galdandi fyri tey nógvu, sum hava fast arbeiði í Tórshavn alt árið ella part av árinum, eins væl og fyri tey, ið hava ørindi í Tórshavn, eru í læru ella tal stýri skeið. Tí kom teimum dátt við, at landsstýrið fyri nøkrum tók "Teistan" úr hesi rutu og í staðin setti hann at sigla eina

ferð um vikuna millum Klaksvík og Tórshavn mitt á degi, og áheitan við í fyrsta lagi 18 undirskriftum er send myndug leikunum um at fáa ta beinleiðis siglingina millum Klaksvík og Tórshavn at halda fram eisini um veturin, tá ið ikki altíð slepst um Leirvíksfjørð og Oyggjarvegurin ofta er stongdur.

Eisini økti landsstýrið 1985-88 um túratalið hjá "Ternuni" um Leirvíksfjørð, soleiðis at sigilt varð um kvøldið við. Frammanundan hevði seinasti túrur hjá "Ternuni" úr Klaksvík verið kl. 17³⁰.

Sjálvt um "Ternuni" nú er ætlað at taka allan tann dagliga flutningin til og úr Norðoyggjum, meðan "Teistin" er tikin úr beinleiðis rutuni millum Klaksvík og Tórshavn, so er túratalið hjá "Ternuni" skorið niður og tann eina av 3 manningum søgd upp. Hetta førir við sær, at "Ternan" í veruleikanum hvønn dag má láta bilar stahda eftir og klárar bíla at taka fatm og fólk. Seinasti túrur hjá "Ternuni" úr Klaksvík leygardag er nú kl. 18³⁰.

Í Norðoyggjum búgva 4.000 fólk, sum hava rætt til at taka lut á fundum, skeiðum og familjusamkomum á meginlandinum og sleppa til hús aftur um kvøldið. Hetta er ikki møguligt sum er, eins og tað heldur ikki er møguligt at leggja fundir o.t. í Norðoyggjum fyri fólk av meginlandinum, sum vilja ikki gista.

"Ternan" siglir um Leirvíksfjørð við storum yvirskoti. Fyri árið 1986 var hetta 2,6 mió.kr., fyri árið 1987 var yvirskotið hjá "Ternuni" 1,8 mió.kr., og fyri árið 1988 er yvirskotið gjørt upp til at vera 1,9 mió.kr. Landsstýrið hevur boðað frá møguligum hækkingum í ferðafólkaprisinum.

Undirritaði vil fegin fáa at vita, um hetta eisini er galdandi fyri rutuna um Leirvíksfjørð, sum einki nalj gevur. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á FØROYA LØGTINGI, 7. november 1989

Niels Pauli Danielsen

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður.

S v a r

uppá

fyrispurning frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-14/1989 viðvíkjandi ferðasambandinum beinleiðis millum Klaksvík og Tórshavn og ferðasambandinum um Lorvíksfjørð.

Spurningurin var soljóðandi:

Kann landsstýrismaðurin í samferðslumálum vátta, at dagliga beinleiðis siglingin millum Klaksvík og Tórshavn morgun og kvøld heldur fram eisini í vetur, og at ferðasambandið við "Ternuni" um Lorvíksfjørð verður eisini seint um kvøldið, og at ferðaseðlaprísurin ikki hækkar?

****

Í vetur hevur ikki verið siglt beinleiðis dagliga millum Klaksvík og Tórshavn morgun og kvøld, og eingin ætlan er um at taka hesa sigling uppaftur. Tó verður ein túrur um vikuna við farmi og ferðafólki sigldur beinleiðis millum Klaksvík og Tórshavn.

Eisini verður spurt, um ferðasambandið við "Ternuni" um Lorvíksfjørð verður eisini seint um kvøldið.

Ætlanin er, at øll strandfaraskipini gera seinasta túr kl. 21 á kvøldi. Tað vil siga, at "Ternan" siglir av Lorvik kl. 21 á kvøldi seinasta túr.

Men her skal viðmerkjast, at ætlanin er at lata "Ternuna" fara úr Klaksvík hálvan tíma fyrr á morgni, so fólk, ið fyrr nýttu beinleiðis siglingina Klaksvík-Tórshavn á morgni, nú kunnu vera í Havn áðrenn arbeiðstíð við hesi rutuni.

Hvat ferðaseðlaprísinum viðvíkur er at siga, at í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 1990, sum landsstýrið legði fyri tingið, varð roknað við eini hækking í ferðaseðlaprísinum, men fíggjarnevndin tók ikki undir við uppskotinum. Sostatt kann ikki roknast við hækkingum í ferðaseðlaprísinum í 1990.

Á Føroya Løgtingi, 25. mai 1990

Jóngarð Purkhús
landsstýrismaður

Lasse Klein
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Jógvan I. Olsen, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-1:/99: Viðvíkjandi hummaraveiðu.

1. Er landsstýrið sinnað at leingja hummaratíðina?

2. Er landsstýrið sinnað at láta loyvi fevna um aðrar mánaðir av árinum umframt tær, sum loyvi er givið til?

3. Kann tað hugsast, at loyvi verður givið t.d. at royna eftir hummara átta mánaðir av árinum og lagt stilt í fýra mánaðir, juni og juli umframt frá hálvum december til hálvan februar?

4. Er landsstýrið sinnað at geva loyvi til royndarveiðu eftir hummara alt árið?

5. Er landsstýrið sinnað at hækka loyvi hjá teimum, sum eru sjómenn burturav, og sum dagliga royna eftir hummara úr 100 teinum upp í 200 teinar?

Viðmerkingar:

Tað, sum bevur sermerkt hummaraveiðuna er, at tað fyriliggja ikki nógvar kanningar av hummaraveiðu undir Føroyum.

Tað einasta heilt konkreta, sum tykist fyriliggja, er, at frá 1947 fram til 1979 var veiðiskapurin fyri tað mesta trol, men í 1980 varð troling bannað, og síðani hava bert teinar verið nýttir.

Tað verður upplýst í einum tilmæli til hummarafiskiskapin frá Fiskirannsóknarstovuni, at "hagtølini fyri tíðarskeiðið 1980 til 1989 eru ófullfíggjað, serstakliga tá hugsað

verður um reynd og skipan eftir ski." (Fiskivinnustovan - Smárit nr. 3/1989).

Tað tykist sera løgið, at ein almennur stovnur skal koma við slíkum viðmerkingum um veiðu eftir hummara. Tað tykist sum um, at áhugin fyri hummaraveiðu hjá almennu myndugleikunum er sera lítil, og at als eingin áhugi er at viðgera støðuna av hummarastovninum yvirhøvur.

Tí er heist eisini viðgerðin av loyvum, teinanøgd og hægst loyvda tonsatal eins ófullfíggjað og kanningarnar hjá teimum almennu myndugleikunum annars tykjast benda á.

Veruleikin er jú tann, at Fiskivinnustovan hevur heilt nágreinilig hagtøl fyri tíðarskeiðið 1980 til 1989, og royndirnar sum t.d. teir 30 bátarnir, sum royna eftir hummara dagliga, eru eisini nøkar.

Veruleikin er eisini tann, at fleiri av teimum, sum royna eftir hummara hava í fleiri ár gjørt ávísar royndir, uttan at almennu myndugleikarnir so frægt sum hava givið hesum royndum ans, sjálvt um víljin frá teimum, sum royna eftir hummara ikki hevur skortað.

Loyvisbræv til hummaraveiðu verður givið í teimum veðurringastu mánaðunum, og mangan er tað so, at tað ringa veðrið hevur ført við sær nógvar uppløgudagar. Teir, sum royna eftir hummara, eru ikki í iva um, at spurningurin um broyting av loyvinum til aðrar tíðir av árinum átti av álvara at verið tikin upp til viðgerðar.

Hummaratíðin tykist at vera ov stutt og átti at verið longd.

Teir, sum dagliga royna eftir hummara, eru ikki í iva um, at nógvur hummari er til, men jú kaldari sjógvurin er, jú minni fáa teir. Hummarafiskiskapurin er nógv ávirkaður av veðrinum. Harafturat kemur, at hummaratíðin, sum er tillutað, er ikki væl egnað til so smáar bátar, sum brúktir verða.

Nevndir hava verið møguleikar fyri t.d. at fiska átta mánaðir av árinum og lagt stilt í fýra mánaðir, juni og juli, umframt frá hálvum december til hálvan februar.

Eitt longt tíðarskeið eftir hummara eigur tí eisini at fevna um royndarfiskiskap allar mánaðirnar av árinum.

Nakrir heilt fáir av teimum, sum reka hummaraveiðu burturav, hava bert loyvi til 100 teinar. Talan er í flestu førum um uppilagstar sjómenn. Teir hava í nógv ár søkt um

loyvi um økt teinatal, men til fánýtis. Tað tykist annars løgið, at slík fólk, sum burturav hava hummaraveiðu til dagligt arbeiði, ikki skulu fáa økt loyvi. Eitt brúkligt loyvi er mett at vera upp á uml. 200 teinar.

Á FØROYA LØGTINGI, 21. november 1989.

Lasse Klein

Tordur J. Niclasen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Jóngerð Purkhús, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-16/1989: Viðvíkjandi dálking av fiskum v.m.

Hvørjar ítøkiligar tiltøk ætlar landsstýrið at seta í verk til tess at minka um dálkingina av okkara fiskum,sundum og vatnun ?

Viðmerkingar:

Øllum er tað kunnugt hvønn týdning reint umhvørvi hevur fyri trívsil og menning hjá flest øllum skapningum, og hevur her á landi verið nógv tosað um vandan av dálking stavandi uttaneftir, uttan at vit í nóg stóran mun hava "sópað fyri egnum dyr."

Tey seinru árini er ein stórug útbygging farin fram innan alivinnuna, og skuldi hetta eisini givið eitt gott íkast til føroyska búskapin.

Reint umhvørvi er ein týðandi táttur fyri hesi vinnu - bæði hvat sjálvari menningin viðvíkur og ikki minst marknaðinum úteftir, tá hugsað verður um kayparan og týdningin av, at hesin veit at tann føroyska vøran kemur úr reinum umhvørvi.

Tí eigur eisini tað at gerast, sum gerast kann, til tess at minka um dálkingina av okkara fiskum, sundum og vatnum.

Á vári 1987 samtykti Føroya løgting, at landsstýrið skuldi fáa gjørt uppskot um og kostnaðarmeting av tiltøkum,ið høvdu til endamáls at minka um dálkingina av okkara fiskum,sundum og vatnum, og var her talan um dálking, sum stavaði frá húsarhaldum,virkjum v.m.

Tá nú 2½ ár eru gingin uttan at nevnda uppskot hevur sæð dagsins ljós, eigur landsstýrið nú at kunna svara upp á setta spurning.

Á FØROYA LOGTINGI 21. nov.1989

951 Tordur J. Niclasen.

Tordur J. Niclasen
løgtingsmaður.

Fyrispurningur

til

Jógvan Sundstein, løgmann

Løgtingsmál nr. 100-17/1989: Viðvíkjandi undirgrundini sum føroyskt sermál.

Hvussu langt er komið við samráðingum við donsku stjórnina og nær kann væntast at undirgrundin verður yvirtikin sum føroyskt sermál?

Viðmerkingar:

Føroysku myndugleikar hava við jøvnum millumbili reisst spurningin viðvíkjandi undirgrundini fyri teim donsku myndugleikunum.

Ymiskt er sum teir politisku flokkarnir her á landi síggja upp á spurningin viðvíkjandi undirgrundini sum føroyskt sermál. Tó kann ikki komast uttan um, at løgtingssamtykt fyrliggur um yvirtøku av undirgrund og havbotni.

Hetta var eisini málsetningur undanfarnu samgongu, og sum eisini var lýst í almannakunngjørdum samgonguskjali.

Hvat skilst, so hava danir ikki verið serliga fegnir um eina yvirtøku og hevur spurningurin um løgfrøðisligar forðingar eisini verið frammi.

Havandi politisku gongdina frá 1948 í huga, skuldi hetta mál verið náttúrligt til yvirtøku og átti at verið framt sum skjótast.

Hvat løgfrøðisligum ivamálum viðvíkur skuldi hetta ikki verið nøkur forðing, tí klárliga er komið fram at:

1. Tað er einki í fólkarættinum, sum fordar fyri at málsøki ráevni í undirgrundini kann vera yvirtikið av heimastýrinum.

2. Grundlógin førir ikki til annað úrslit.

3) Tað finst eingin donsk lóggáva ella statsrættarligar grundreglur, ið forða fyri einari yvirtøku.

Hetta er m.a. nakað av tí, ið løgfrøðisliga "undirgrundarnevndin" í 1985 kom til.

Einasta forðingin kann liggja her heima hjá okkum sjálvum - nevnliga tann politiska forðingin.

Tó kann tað illa hugsast, at politisk forðing í sitandi samgongu skuldi verið orsøk til at undirgrundin ikki í hesum valskeiði kann yvirtakast sum føroyskt sermál.

Men tá samgonguskjal hjá sitandi landsstýri einki ítøkiligt sigur um, hvørjar ætlanir eru á hesum øki - og einki hevur verið at frætta, so er tað at undirritaði loyvir sær at seta spurning, sum øll frælslynt og tjóðskaparsinnað leingjast eftir at frættað - sjálvandi í vónini um, at svar løgmans avdúkar veruleikar sum eru sjálvsagd rættindi hjá føroysku tjóðini.

Á FØROYA LØGTINGI 12.dec.1989

Tordur J. Niclasen

Jógvan Sundstein
løgmaður.

S v a r

uppá

fyrispurning frá Torda J. Niclasen, løgtingsmanni, í tingmál nr. 100-17/1989: viðvíkjandi undirgrundini sum føroyskt sermál.

Spurningurin var soljóðandi:

Hvussu langt er komið við samráðingunum við donsku stjórnina og nær kann væntast at undirgrundin verður yvirtikin sum føroyskt sermál?

****

Í august 1988 vóru samráðingar millum Føroya Landsstýri og donsku stjórnina um undirgrundina.

Sambært góðkendum referati frá fundinum varð niðurstaðan hendan:

1) Indledende forhandlinger, som skal dreje sig om, i hvilken omfang og på hvilke vilkår der - med respekt af Statens højhedsret og under hensyntagen til rigsfællesskabets interesser - vil være muligt, at hjemmestyret overtager forvaltningen af råstofområdet som særanliggende.

2) Nedsættelse af og udformning af kommissorium for et ekspertudvalg med deltagelse fra begge sider til behandling af de elementer, der skal indgå i ordningen.

3) På dette grundlag en afsluttende politisk forhandling om udformningen af ordningen.

4) Parterne er enige om at bestræbe sig på at føre forhandlingerne frem til et resultat snarest.

Forsætismálaráðið sendi í apríl 1989 uppskot til kommisorium og uppskot til teir donsku nevndarlimirnar.

Frá føroyskari síðu hava vit enn ikki tikið støðu til kommisorið og heldur ikki til formansskapin í embætismannanevndini.

Undirgrundsnevndin hjá samgonguni hevur havt ein fund um málið, og verður næsti fundurin ein av fyrstu dagunum.

Á Føroya Løgtingi, 24. januar 1990

Jógvan Sundstein
løgmaður

Niels Pauli Danielsen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Jógvan Sundstein, løgmann

Løgtingsmál nr. 100-18/1989: Viðvíkjandi stýrislimum fyri Føroyagrunnin frá '971.

Av hvørji orsøk hevur landsstýrið tilnevnt nýggjar limir í stýrið fyri Føroyagrunnin frá 1971 og ikki fylgt innstillingini frá býráðnum og tilmælinum hjá verkaføroyunum, sum ásett er í viðtøkunum, góðkendar í landsstýrinum hin 16. december og Danmarks Nationalbank hin 28. december 1981, og samsvarandi kunngerð landsstýrisins frá 10. februar 1982?

Viðmerkingar:

2 nýggir stýrislimir skulu 4. hvørt ár veljast í nevndina fyri Føroyagrunnin frá 1971. Teir eru 4 í tali og sita fyri 8 ár hvør.

Føroya Landsstýri tilnevnir limirnar, harav 3 verða tilnevndir samb. § 4 í viðtøkunum eftir innstilling frá býráðnum í Klaksvík, sum frammanundan fær tilmæli frá fakfeløgunum, sum hava samskifti við p/f J.F.Kjølbro.

Í fjør skuldu soleiðis 2 nýggir stýrislimir verða tilnevndir. Fakfeløgini í Klaksvík tilmæltu og býráðið innstillaði. Hor hendi tað løgna, at býráðið innstillaði sum nr. 1 mann, ið fakfeløgini ikki høvdu tilmælt, og sum heldur ikki hevði játtað og seinni tók seg aftur. Sum nr. 2 innstillaði býráðið Frits Olsen, sum Klaksvíkar Útróðrarfelag hevði til-

[illegible] stýrislimur, síðani grunnurin varð settur á stovn.

Tað ljóðar, at landsstýrið hevur skúgvað bæði innstillingar og tilmæli fakfelagsanna til viks og tilnevnt heilt aðra limir. Tað ljóðar somuleiðis, at formaðurin í nevndini, sum hevur sitið hálvt skeið sítt, hevur sagt seg frá og tikið seg heilt úr nevndini.

Fakfelagini hava kært til landsstýrið og til Danmarks Nationalbank, at viðtøkurnar fyri grunnin verða ikki hildnar, sum bæði landsstýrið og Danmarks Nationalbank hava undirskrivað og kunngjørt.

Tí verður hesin fyrispurningur settur løgmanni.

Á FØROYA LØGTINGI, 14. februar 1990

Niels Pauli Danielsen

Jógvan Sundstein
løgmaður

S v a r

uppá

fyrispurning frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-18/1989: Viðvíkjandi stýrislimum fyri Føroyagrunnin frá 1971.

Spurningurin er soljóðandi:
Av hvørji orsøk hevur landsstýrið tilnevnt nýggjar limir í stýrið fyri Føroyagrunnin frá 1971 og ikki fylgt innstillingini frá býráðnum og tilmælinum hjá verkafeløgunum, sum ásett er í viðtøkunum, góðkendar í landsstýrinum hin 16. desember og Danmarks Nationalbank hin 28. desember 1981, og samsvarandi kunngerð landsstýrisins frá 10. februar 1982?

Sambært viðtøkunum hjá Føroyagrunninum frá 1971 skal stýrið hava 4 limir, sum verða valdir tveir og tveir 4. hvørt ár. Skeiðið hjá hvørjum limi er sostatt 8 ár.

Frá 1. oktober 1984 vórðu valdir
Jógvan Isaksen, Klaksvík (eftir tilmæli)
Ove Frederiksen, Klaksvík.
Hesir sita til 1. oktober 1992, men í oktober 1989 segði Ove Frederiksen seg frá og í hansara stað varð Anskar Hansen, Klaksvík, valdur fyri restina av skeiðinum.

Skeiðið hjá tveimum øðrum nevndarlimum, Sólbjørn Jacobsen og Frits Olsen, gekk út hin 1. oktober 1988.

Hin 16. januar 1989 valdi landsstýrið Sólbjørn Jacobsen aftur í stýrið fyri 8 ár. Men hin nevndarlimurin varð ikki valdur.

Hesin limur skuldi veljast "efter indstilling fra Klaksvik kommunalbestyrelse, og efter at kommunalbestyrelsen forinden har indhentet udtalelser fra foreninger, der repræsenterer arbejdere, funktionærer, hjemmefiskere o.lign. ..."

Feløgini skutu upp mótvegis Klaksvíkar kommunu at instilla millum hesar persónar:
Johan A. Reyðberg
Frits Olsen
Anna Mikkelsen
Jóngerð Ellingsgaard.

Kommunan innstillaði ongan av hesum persónum, men skeyt upp at

Velja Eyðfinn Færø, Klaksvík.

Eyðfinn Færø bar seg undan vali, og landsstýrinum stóð tí fritt at velja lim í stýrið.

Hin 2. november 1989 valdi landsstýrið tí Ísak Mikladal, Klaksvík, í stýrið fyri Føroyagrunnin frá 1971.

Á Føroya Løgtingi, 20. februar 1990

Jógvan Sundstein
løgmaður

Jørgen Niclasen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Jóngerð Purkhús, landsstýrislim.

Løgtingsmál nr. 100-19/89: Viðvíkjandi vegagerð til undirsjóvartunnilin.

Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið við ætlaðu vegagerðini í Vágum ávegis til tunnilsmunnan á undirsjóvartunnlinum um Vestmannasund?

Viðmerkingar:

Væl vitandi um almennu sparingarnar á samferðsluøkinum, loyvi eg mær at vísa á skeivleikan í, at so at siga einki almant vegaarbeiði í longri tíð hevur verið í Vágoynni.

Okkum er kunnugt, at semja er í landsstýrissamgonguni um at útseta fleiri størri samferðslulig íløguarbeiði, soleiðis sum búskaparligu umstøðurnar eru í landinum eftir ta mangan óforsvarligu peninganýtsluna undir farna landsstýri.

Sjálvandi skal Vágoyggin bera sín part av neyðugu skerjingunum. Eingin ivi um tað.

Kin vegin er ikki rætt at steðga heilt eini náttúrligari útbygging av hesi landsins triðstørstu oyggj.

Tann 27. oktober í fjør vendi Felagskommunan í Vágum sær til landsstyrið við áheitan um, at vegagerðin til vestara tunnilsmunnan til undirsjóvartunnilin um Vestmannasund verður byrjað.

Nú eru góðir 4 mánaðir gingnir, so tað er rímiligt at fáa svar úr Tinganesi, um landsstýrið hevur viðgjørt hesa áheitan, ella um landsstýrið annars hevur ætlanir um at byrja hesa vegagerð til vars.

Hóast landsstýrissamgongan er samd um at sjálv tunnilsgerðini er útsett í eina tíð, skuldi einki verið til hindurs fyri, at farið verður undir vegagerðina ávegis til vestara tunnilsmunna til undirsjóvartunnilin um Vestmannasund.

Á FØROYA LØGTINGI, 7. mars 1990

Jørgen Niclasen,

løgtingsmaður

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður.

S v a r

uppá

fyrispurning frá Jørgen Niclasen, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-19/89 viðvíkjandi vegagerð til undirsjóvartunnilin.

Spurningurin var soljóðandi:

Hvørja ætlanir hevur landsstýrið við ætlaðu vegagerðini í Vágum ávegis til tunnilsmunna á undirsjóvartunnlinum um Vestmannasund?

****

Í samgonguskjalinum stendur, at undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi verður útsettur til byrjanina av 1992.

Tá vegagerðin í Vágum ávegis til tunnilsmunnan á undirsjóvartuninum er at rokna sum partur av tunnilsprosjektinum, verður heldur ikki farið undir hetta arbeiði fyrr enn í 1992.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

Niels Pauli Danielsen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

løgmans

Løgtingsmál nr. 100-21/89: Viðvíkjandi virðing landsstýrismanna fyri løgtinginum og teimum fyrispurningum, løgtingið hevur samtykt, at landsstýrismenn skulu svara, smb. tingskipanina, § 20, 3. stk., innan 10 dagar.

Hvat vil løgmaður sum ovasti fyrisitingarleiðari fyri landsstýrið, ið er bundið av samábyrgd, gera fyri, at landsstýrismenn halda seg til tingskipanina og svara settum fyrispurningum, sum løgtingið samtykkir, at landsstýrismenn skulu svara?

Viðmerkingar:

Tingskipanin § 20 sigur, at tingmaður kann ynskja mál til umrøðu og biðja um frágreiðing frá landsstýrislíni, sum skal svara fyrispurningi á fundi seinast 10 dagar aftan á, at tingið hevur góðkent, at fyrispurningurin skal svarast.

Í hesi tingsetu, sum nú fer at halla, hava verið settir fleiri fyrispurningar, sum onn ikki eru svaraðir, sjálvt um gingnir eru bæði 4 og 6 mánaðir, síðan løgtingið samtykti, at fyrispurningarnir skulu verða svaraðir.

Víst kann verða til ein fyrispurning frá Jákupi Lindenskov um ólógliga umfarinum og sølu av rúsdrekka í Føroyum, sum løgtingið samtykti 31. oktober 1989, og til tveir fyrispurningar hjá undirritaða um siglingarrennu í Haralds-

sundi og um ferðasambandið beinleiðis millum Klaksvík og Tórshavn og millum Klaksvík og Leirvík. Tað er meiri enn hálvt ár, síðan løgtingið samtykti, at hin fyrri skuldi verða svaraður, og skjótt 5 mánaðir, síðan tingið samtykti, at hin seinni skuldi verða svaraður.

Tað hevur so nógv verið frammi seinastu tíðina um virðingina fyri løgtinginum og orðalagnum, ið nýtt verður í álitum á tingi.

Tað vil bøta um virðingina fyri aldagamla tingi okkara, um tingmenn og landsstýrismenn gera, hvat ið teir kunna fyri at halda sog til samtyktir løgtingsins.

Á FØROYA LØGTINGI, 22. mars 1990.

Niels Pauli Danielsen

Jógvan Sundstein
løgmaður

S v a r

uppá

fyrispurning frá Niels Pauli Danielsen, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-21/1989: Viðvíkjandi virðing landsstýrismanna fyri løgtinginum og teimum fyrispurningum, løgtingið hevur samtykt, at landsstýrismenn skulu svara, smb. tingskipanini § 20, stk. 3, innan 10 dagar.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Hvat vil løgmaður sum ovasti fyrisitingarleiðari fyri landsstýrið, ið er bundið av samábyrgd, gera fyri, at landsstýrismenn halda seg til tingskipanina og til ásetta tíð svara settum fyrispurningum, sum løgtingið samtykkir, at landsstýrismenn skulu svara?

[redacted]

Sambært tingskipanini § 20 skal fyrispurningur til landsstýrismann svarast seinast 10 dagar aftaná, at tingið hevur samtykt, at hann skal svarast. Í løtini liggja hesir ósvaraðu spurningar í tinginum:

100-6: Fyrispurningur frá Niels P. Danielsen, løgtingsmanni til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann.
100-10: Fyrispurningur frá Sv. Áge Ellefsen, løgtingsmanni til Ivan Johannesen, landsstýrismann.
100-11: Fyrispurningur frá Jákup Lindenskov, løgtingsmanni til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann.
100-13: Fyrispurningur frá landsstýrismonnunum Sv. Áge Ellefsen og Óla Breckmann til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann.
100-14: Fyrispurningur frá Niels P. Danielsen, løgtingsmanni til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann.
100-19: Fyrispurningur frá Jørgen Niclasen, løgtingsmanni til Jóngerð Purkhús, landsstýrismann.

Hvør sær hava landsstýrismenninir skyldu til at svara teim fyrispurningum, løgtingið hevur álagt teimum at svara. Hetta skulu teir eisini gera, áðrenn tíðarfreistin er úti, um tingið annars er samað.

Sum formaður landsstýrisins havi eg álagt landsstýrismonnunum at svara teim spurningum, sum enn eru ósvaraðir. Eisini skulu vit í framtíðini svara sambært tingskipanini. Um spurningurin ikki kann svarast fullfíggjað, eigur hann at svarast so væl sum

møguligt. Fyritreytin fyri hesum er tó, at Løgtingið og Løgtingsskrivstovan avgreiða spurningin formliga sett til viðkomandi landsstýrismann í Tinganesi, og at hann ikki sjálvur skal leita spurningin fram.

Eisini eigur løgtingsformaðurin at rykkja landsstýrismannin eftir svari, um tað ikki kemur til tíðina og annars geva ástøði, um hitt ikki hjálpir.

Á Føroya Løgtingi, 13. mars 1990

Jógvan Sundstein
løgmaður

Atli P. Dam
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Olaf Olsen, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-22/1985: Viðvíkjandi yvirlækna-, narkosusjúkrasystra- og sjúkrasystrasetan við Suðuroyar sjúkrahús og um fíggjarætlanarviðgerðina fyri sjúkrahúsini hvørt sær.

Landsstýrismanninum í heilsumálum verða settir hesir spurningar.

1. Vil landsstýrismaðurin beinanvegin bera umsorgan fyri, at áður játtaða 3. yvirlæknastarvið við Suðuroyar sjúkrahús verður lýst leyst, og at starvið verður sett skjótast gjørligt.
2. Vil landsstýrismaðurin beinanvegin bera umsorgan fyri, at 3. norkosusjúkrasystrastarvið verður normerað og lýst leyst at seta skjótast gjørligt.
3. Vil landsstýrismaðurin beinanvegin bera umsorgan fyri, at tey bæði leyst settu sjúkrasystrastørvini á deildunum, sum eru niðurløgd vegna sparikrøv frá sjúkrahússtjóra og ráðgeva hans - ráðgevi uttan um setanarvilkarini sum arbeiðsmedicinari og uttan, at starvið er lýst leyst - verða sett aftur skjótast gjørligt.
4. Vil landsstýrismaðurin tryggja, at løgtingsins greiða ætlan - so sum fram kom undir fíggjarlógarviðgerðini í december, og sum fyrr er samtykt - at sjúkrahúsini hvørt sær framvegis hava ábyrgd av gerð av fíggjarætlan fyri egið økí og framvegis hvørt sær hava ábyrgd av, at egin fíggjarætlan heldur - ikki verður broytt.

Viðmerkingar:

Seinnu helvt av fimtiárunum og øll sekstiárini - aftaná læknastríðið og aftaná, at tvey yvirlæknastørv vóru "normerað" og sett við tey smærru sjúkrahúsini - virkaði sjúkrahúsverkið eftir umstøðunum rættiliga væl, men um tíggjuársskiftið seksti/sjeyti tóku trupulleikar seg upp, tí læknarnir, sum hevdu hvørt sítt "speciali", løgdu frá sær og tað gjørdist trupult at fáa aðrar settar í staðin.

Hetta hevði fleiri orsøkir m.a., at togan bleiv í millum tey smærru sjúkrahúsini og Landssjúkrahúsið um "speciali" og um heilsupolitikk sum heild.

Við ongum "speciali" vísti tað seg torført at fáa yvirlæknastørv í Suðuroy og Norðoyggjum sett av nýggjum, og serliga Suðuroyar sjúkrahús hevði yvirlæknaliga øll sjeytiárini sera stóran trupulleika við støðugt skiftandi fyribilssettum yvirlæknum og vikarum.

Í Klaksvík varð so heppið, at lækni við serútbúgving tók við starvi rættiliga tíðliga, og varð harvið eitt grundleggjandi "speciali" lutvíst varðveitt sum støði undir uppbyggingini av eini skurðlæknamanning. Í hesum lá eisini faklig atdráttarmegi fyri ungar útbúnar læknar, ið ikki fingu ella ikki ynsktu starv við Landssjúkrahúsið. Læknatalið í Klaksvík er tí í dag 7, meðan tað í 1970 var 2.

Við meira enn tvífalt so mongum starvsfólkum sum í Suðuroy nerva sparingarnar í Norðoyum tí ikki so hart sum í Suðuroy, har avloysing ikki fæst fyri burturspard starvsfólk.

Í áttatíárunum hava suðringar og norðoyingar fingið læknar lúkandi § 14 treytir í fyrst starv, men tað er eyðsæð, at hesir verða ikki í starvi, skulu teir í áravís ganga einsamallir í 24 tíma vaktum annan hvønn dag - sunnudag og hálgidag við. Í Suðuroy hartil uttan stuðul av yngri lækna í "forvakt".

Teir mugu og skulu hava tey arbeiðsvilkor, sum arbeiðaraverndarlógin tilskilar (11-tíma reglan), og t.d. tey vilkor, teir 54 læknarnir við Landssjúkrahúsið hava.

Eingin orkar at arbeiða í áravís undir slíkum niðurbrótandi umstøðum, sum nú valda,

Nýggja "Amtsrådsforeningsoverenskomsten" sigur eisini, at 3-skifti vakt skal galda alla staðni sum minsta mark.

Tær ítøkiligu sparingar, ið tilmæltar vórðu av sjúkranússtjóra, ráðgeva hans og landsstýrinum viðvikjandi Suðuroyar sjúkrahúsi, vóru dyggiliga feldar av løgtinginum undir fíggjarlógarviðgerðini.

Kortini hevur Suðuroyar sjúkrahús fingið at vita, at hesar sparingar skulu fremjast sum ætlað, og tí skulu eingi av støruunum, nevnd í fyrispurninginum, setast.

Miðsavnarar vita, at eydnast at skapa so stórar arbeiðstrupulleikar fyri nøkur av teim fólkum, sum skulu tryggja eina líkinda skurð- og sjúkraviðgerð, at hesi siga upp, so verður eingin settur í staðin, og ná so viðgerðin sum ætlað flytast til Havnar.

Hesum lata vit suðuroyingar okkum ikki lynda!

At finna upp á at siga, at allir suðuroyingar skulu føðast í Havn, at siga, at tyrla kann flúgva í øllum veðri, at siga, at allar vanlukkur skulu henda í millum kl. 08.00 og kl. 16.00 og at siga, at ein kann ganga frá rímuligari vaktarskipan fyri tey starvsettu, er tað sama sum at avdúka, at ein lítla hóming hevur av, hvat tað er at liva undir teim náttúruviður- skiftum, givin vórðu føroyingum úti um oyggjarnar.

Undir fíggjarlógarviðgerðini varð greitt víst á, at krøvini til sparingar á Suðuroyar sjúkrahúsi, tá hesi vóru sett í mun til samlaða kostnaðin av teim økjum, har hugsast kundi um sparing, merktu heilt órímuligan niðurskurð av virksemunum. Hetta tí at øki eru, har einki gerst við sparing. So stórur niðurskurður var tað sama sum krav um at lata sjúkrahúsið aftur.

Játtaðar vóru so 1,2 milliónir afturat, og ein skilti, at burtur úr "tiltaksjáttan" kundi kanska fáast 1,3 milliónir afturat, men sjálvt um henda upphædd fekst afturat tí av sjúkrahússtjóranum uppskotna, hevði niðurskurðurin - tó at sjúkrahúsið tá fekk virkað - nærkast tí óforsvarliga og framvegis verið nógv størri enn á nøkrum øðrum sjúkrahúsi.

Suðuroyartingmenn kenna tað afturhald, sum sjúkrahúsumsiting okkara hevur sýnt longu 20 ár frammanundan, at sparikrøv - eisini út um tað forsvarliga - verða sett

hinum sjúkrahúsunum, og rokni eg við, at eg eisini teirra vegna kann siga, at vit á ongan hátt kunnu góðtaka, at hesar tørvandi starvssetanir á Suðuroyar sjúkrahúsi fara at bera í sær, at læknar okkara, narkosusjúkrasystrar okkara ella onnur fara úr starvi, tí vanligar arbeiðstreytir ikki verða fylgdar, og krevja tí, at størvini, nevnd undir 1-3, verða sett beinanvegin.

Skuldu tá trupulleikar rakstrinum viðvíkjandi tó framvegis verið, eigur landsstýrismaðurin at áleggja sjúkrahúsumsitingini í Havn at senda fólk út á bygd til at fylla hesi størv, tá tørvur er, tí nóg mikið av fólki vil verða eftir í Havn til, at vaktarskipan og sáttmáli kunnu haldast.

Samstundis eigur landsstýrismaðurin at syrgja fyri, at skurðlæknarnir av bygd - medicinarar við - sleppa at nýta serkunnleika og evni síni á Landssjúkrahúsinum so nógva tíð árliga, at hesin serkunnleiki verður viðlíkahildin.

Í meðan skulu so læknar úr Havn røkja teirra arbeiði á bygd.

Hetta hevði tryggjað bestu nýtsluna av "resoursum" og "ekspertisu", tí sjálvsagt duga bygdalæknarnir sumt betri enn læknarnir við Landssjúkrahúsið og øvugt.

Tað er heilt óforsvarligt, at <u>ein</u> narkosusjúkrasystir gongur 24 tíma vakt í Suðuroy mánaða aftan á mánaða, tí hon er einsamøll, - og fáar freistast at søkja, kunnu tær ikki hava trygd fyri, at arbeiðstíðin er 8 tímar um dagin í meðal, og hartil eru tríggjar normeringar kravdar - meðan fleiri narkosulæknar og narkosusjúkrasystrar ganga á skift í Havn, og ein narkosulækni og fleiri narkosusjúkrasystrar skulu ganga vakt í Klaksvík. Hesin verður so áttandi læknin í Klaksvík.

Sagt hevur verið, at tey smáu sjúkrahúsini hava "kravt til sín" seinnu árini og at hetta skerjir møguleikarnar fyri útbyggjan av landssjúkrahúsinum.

Hjálagdar eru talvur sum týðiliga sýna, hvør hevur fingið úrslit av, at krevja til sín, um slíkt kann sigast verða hent.

Hesar talvur vísa eisini, at skerjingin við tveimum sjúkrasystrum er sera stór, tá einans 18 eru settar. Sum er, er torført at fáa náttartænastu á deildunum útinta.

Hvat spurningi 4 viðvíkur ynskir undirritaði trygd fyri, at tær trygdir, sum liggja í sjúkrahúslóggávuni nevniliga, at vit hava trý sjálvstøðug sjúkrahús við egnari "visitatión", sjálvstøðugum rætti til at senda sjúklingar til viðari viðgerð á Ríkishospitalinum og einum sjálvstøðugum sjúkrahússtýri, sum hevur sjálvstøðuga ábyrgd av egnari fíggjarætlan, ikki verða sniðgingnar av landsstýri og sjúkrahússtjóra/ráðgeva, ið nú tykjast einaferð enn at stinga "sentralistiska" ideologi út í kortið.

Hinvegin metir undirritaði tað týdningarmikið, at læknarnir framvegis eru settir við sjúkrahúsverk Føroya soleiðis, at magnið verður nýtt best møgulligt ikki bert í Havn, men á øllum trimum sjúkrahúsunum.

Hesa "rokering" í millum tey trý sjúkrahúsini er skilagott at samvirka um, men fyri at røkka skilagóðari loysn her, er ikki neyðugt at gera felags fíggjarætlan og harvið útvatna ábyrgdina hjá teimum trimum sjúkrahúsunum.

Vit vilja ikki hava tær hugsanir um "sentralisering", sum vórðu feldar, tá sjúkrahúslógin varð samtykt, snýktar inn gjøgnum bakdyr.

Á FØROYA LØGTINGI, 21. mars 1990

Atli P. Dam

Olaf Olsen
landsstýrismaður

S v a r

uppá

fyrispurning frá Atla P. Dam, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-22/1989: Viðvikjandi yvirlækna-, narkosusjúkrasystra- og sjúkrasystrasetan við Suðuroyar sjúkrahús og um fíggjarætlanarviðgerðina fyri sjúkrahúsini hvørt sær.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Vil landsstýrismaðurin beinanvegin bera umsorgan fyri, at áður játtaða 3. yvirlæknastarvið við Suðuroyar Sjúkrahús verður lýst leyst, og at starvið verður sett skjótast gjørligt.

2. Vil landsstýrismaðurin beinanvegin bera umsorgan fyri, at 3. narkosusjúkrasystrastarvið verður normerað og lýst leyst at seta skjótast gjørligt.

3. Vil landsstýrismaðurin beinanvegin bera umsorgan fyri, at tey bæði leyst settu sjúkrasystrastørvini á deildunum, sum eru niðurlogd vegna sparikrøv frá sjúkrahússtjóra og ráðgeva hansara - ráðgevi uttan um setanarvilkorini sum arbeiðsmedisinari og uttan, at starvið er lýst leyst - verða settar aftur skjótast gjørligt.

4. Vil landsstýrismaðurin tryggja, at løgtingsins greiða ætlan, sum kom fram undir fíggjarlógarviðgerðini í desember, og sum fyrr er samtykt, at sjúkrahúsini hvørt sær framvegis hava ábyrgd av gerð av fíggjarætlan fyri egið øki og framvegis hvørt sær hava ábyrgd av, at egin fíggjarætlan heldur - ikki verður broytt.

Fyrst skal eg viðmerkja, at eg sum landsstýrismaður bert havi sitið fáar mánaðir við einari fíggjarætlan fyri heilsuverkið, sum er álvarsliga skerd í mun til 1989, so sum allar aðrar greinir, tí ov mikið er nýtt av peningi framman undan. Hóast ovurnýtsluna undanfarin ár, hevur tað tó ikki verið nóg mikið av peningi - ella vilja - til at uppfylla tær treytir, sum Atli P. Dam nú krevur uppfyltar. Hann sat sum løgmaður og hevði tí ávísan møguleika at uppfylla treytirnar, sum hann nú krevur av øðrum. Tað er sera torført við tí lakara peninginum at uppfylla tær nú.

Til fyrispurningarnar havi eg hesar viðmerkingar:

að 1: Landsstýrið samtykti á fundi 20. november 1987 at normera 3. yvirlæknastarvið í kirurgi við Suðuroyr Sjúkrahús, men starvið er ongantíð játtað í fíggjarnevndini ella í løgtinginum. Stýrið fyri Suðuroyar Sjúkrahús avgjørdi í januar 1988 ikki at lýsa starvið leyst. Ikki fyrr enn 19. mars 1990 varð spurningurin tikin uppaftur á stýrisfundi og tá varð avgjørt at lýsa 3. yvirlæknastarvið leyst.

Í álitinum fyri fíggjarlóg gjørdi fíggjarnevndin vart við, at einki alment starv verður normerað í 1990 og sostatt heldur ikki triðji kirurgurin til Suðuroyar Sjúkrahús.

Sjúkrahúsverkið má í hesum ári klára seg við teimum læknum vit nú hava. Í flestu førum verður heldur ikki ráð at seta fritíðar-avloysarar.

ad 2: Á Suðuroyar Sjúkrahúsi eru bert normerað 2 narkosusjúkra-systrastørv og triðja starvið rennur tí ímóti løgtingssamtyktini um onga nýnormering í 1990. Einasta gongda leið í ár er á hesum øki, sum innan læknaøkið, at samstarva við hini bæði sjúkra-húsini.

ad 3: Í triðja fyrispurningi spyr Atli P. Dam, um 2 leyst sett sjúkrasystrastørv, sum nú eru niðurløgd vegna sparikrøv frá sjúkrahússtjóranum og ráðgeva hansara, verða sett aftur skjótast gjørligt.

Her er ikki talan um nýnormerað størv, tí er einki til hindurs fyri, at Suðuroyar Sjúkrahús setir tær nevndu sjúkrasystrarnar. Treytin er bert at játtanin verður hildin.

Sparikrøvini eru ikki sett fram av sjúkrahússtjóranum. Sjúkrahús-stjórin fekk í juli 1989 eins og aðrir stovnsleiðarar boð frá landsstýrinum um at gera eina fíggjarætlan fyri hvørt sjúkrahúsið innan givnar karmar. Tá tað í álitinum frá løgtingsins fíggjar-nevnd stendur, at siggjast skal burtur frá øllum uppskotum um sparingar, sum higartil hava verið frammi, skal tað skiljast soleiðis, at tey uppskotini ikki eru vrakað av fíggjarnevndini (og løgtinginum), men at tey ikki skulu vera bindandi, t.v.s. at um broytingar verða skotnar upp, so kunnu tær verða framdar, um tað verður mett, at tað er skilabetri ella lættari at fremja enn upprunauppskotið. Tað er tí upp til tær einstøku sjúkrahúsleiðsl-urnar at finna fram til fíggjarætlan innan settu karmarnar.

Í fyrispurninginum verður eisini nevnt, at ráðgevi sjúkrahús-stjórans er settur, uttan at starvið er lýst leyst og uttan um setanarkorini sum arbeiðsmedísinari. Á fundi 10. desember 1988 millum Atla P. Dam, táverandi løgmann, og sjúkrahússtjóran varð avtalað, at sjúkrahússtjórin skuldi fáa ta hjálp og ráðgeving honum tørvaði. Í tráð við hesa avtalu gjørdi Føroya Landsstýri á fundi 21. november 1989 av, eftir áheitan frá sjúkrahús-stjóranum, at styrkja sjúkrahússtjóraembætið við læknaligum kunnleika og heitti tí á yvirlæknan á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í sjúkrahúsverkinum at átaka sær at vera lækna-stjóri fyri eitt tíðarskeið, sum ein partur av hansara starvsøki. Yvirlæknin tók við hesi víðkan av starvsøkinum. Her er soleiðis ikki talan um nýtt starv, sum rímuligt er at lýsa leyst.

ad 4: Mannagongdin við gerð av fíggjarætlan er, at sjúkrahús-stjórin eftir uppskoti frá teimum einstøku sjúkrahússtýrunum ger fíggjarætlan. Vanligt hevur ikki verið, at sjúkrahússtjórin broytir í einari fíggjarætlan, sum heldur seg innanfyri givnu

karmar. Ger stýrið ikki fíggjrætlan, er tað ábyrgd sjúkrahús-stjórans. Viðgerðin av fíggjarlógini 1990 sló fast, at sjúkrahúsini eru 3 sjálvstøðug rakstrarstøð, og soleiðis fer eisini at verða. Sjúkrahúsini koma hvørt sær at hava ábyrgd fyri egnu fíggjarætlan. Sparingarnar, sum vórðu tilmæltar av sjúkrahús-stjóranum, eru ikki settar meira úr gildi enn so, at kunnu sjúkrahússtýrini ikki sjálv koma við uppskotum um aðrar sparingr, so er tað uppskotið frá sjúkrahússtjóranum, sum stendur við. Vit hava havt álit á leiðslunum fyri sjúkrahúsini, soleiðis at tey uppskot, sum tey eru komin við, eru tikin til eftirtektar næstan uttan undantak, um tað verunliga hevur verið sparing við teimum og ikki bert ein flyting til onnur rakstrarstøð.

Grundin til at sjúkrahússtjórin í fíggjarlógaruppskotinum bað um at tey trý sjúkrahúsini vóru eitt rakstrarstað, var bert at skapa møguleika fyri rationellum rakstri. Tað er burturvið her at tala um ætlanir um miðsavnan. Tað er tvørturímóti ætlanin í minsta lagi at varðveita virkisstøðið á teimum smáu sjúkrahúsunum, men fyri at koma burturfrá óneyðugum og dýrum dupultfunktiónum, mugu vit gera landsfevnandi sjúkrahúsætlanir, sum viðhvørt fara at stríða ímóti lokalum ynskjum. Sagt á annan hátt: Landsstýrið góðtekur núverandi starvsfólkabýti millum sjúkrahúsini og ætlanin er ikki, at nakar skal verða fyri lutfalsligum vanbýti, men landsstýrið skilar sær rætt til at gera eina ætlan fyri sjúkrahúsverkið, sum tryggjar optimalan rakstur.

Eg eri samdur við Atla P. Dam, at læknarnir framvegis eiga at verða settir við Sjúkrahúsverk Føroya, og at teir skulu kunna flytast ímillum tey ymisku sjúkrahúsini til gagns fyri teir sjálvar og sjúklingarnar.

Eru sjúkrahúsviðurskiftini í Suðuroynni vorðin so vánaliga tey seinastu 20 árini, sum Atli P. Dam skrivar í viðmerkingunum - hann hevur tó verið løgmaður tað mesta av tíðini - so kundi hann tó verið byrjaður at broyta tey til tað betra áðrenn hann fór frá. Eg vænti tó, at viðurskiftini fara at betrast, hóast vit eru noydd at geva hvørja krónu út við varðsemi og skynsemi.

Á Føroya Løgtingi, 28. mars 1990

Olaf Olsen
landsstýrismaður

Tórbjørn Poulsen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Signar Hansen, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-24/89: Viðv. Mentunnargrunni Føroya løgtings.

Hvat er orsøkin til, at landsstýrið hevur broytt reglugerðina fyri Mentunnargrunn Føroya løgtings soleiðis, at Listafólkasamband Føroya ikki longur skal velja lim í nevndina fyri grunnin?

Viðmerkingar:

Sambært § 3 í reglugerð nr. 95 frá 16. sept. 1986 skal Mentunnargrunnur Føroya løgtings verða stýrdur av nevnd við 5 limum. Føroya løgting velur 3 limir, Føroya landsstýri ein og Listasamband Føroya (LISA) ein lim.

Við reglugerð nr. 29 frá 28. febr. 1990 er hesa skipan broytt soleiðis, at Føroya løgting velur 3 limir og landsstýrið velur 2 limir, harav annan eftir tilmæli frá LISA.

Tað kann tykjast løgið, at landsstýrið soleiðis tekur rættin frá listasambandinum, sum er ein stórur og virkin felagsskapur, at velja lim í stýrið fyri grunni, havandi í huga, at listasambandið júst varð sett á stovn orsakað av, at landsmyndugleikarnir søknaðust eftir einum felagsskapi, ið kundi umboða listafólk.

Vit hava nógv dømi um, at landsstýrið ikki fylgir gjørdum tilráðingum. Tað er eisini komið fyri, at landsstýrið hevur valt lim, sum als ikki er í tilmæli, samb. eitt nú løgtingsmál nr. 100-18/89: Viðvikjandi stýrislimum fyri Føroya-

grunnin frá 1971.

Tað er at undrast yvir, at landsstýrið vísir Listasambandi Føroya, sum umboðar einar 2000 limir, so vánaliga sømd - tí henda fyrispurning til landsstýrismannin í mentamálum.

Á FØROYA LØGTINGI, 28. mars 1990

Tórbjørn Poulsen

Signar Hansen
landsstýrismaður

S v a r

uppá

fyrispurning frá Tórbjørn Poulsen, løgtingsmanni, í løgtingsmáli nr. 200-24/1989: viðvíkjandi Mentunargrunni Føroya Løgtings.

Fyrispurningurin er soljóðandi:
Hvat er orsøkin til, at landsstýrið hevur broytt reglugerðina fyri Mentunargrunn Føroya Løgtings soleiðis, at Listafólkasamband Føroya ikki longur skal velja lim í nevndina fyri grunnin?

Mentunargrunnur Føroya Løgtings varð stovnsettur í 1946. Løgtingið skuldi velja allar 3 limirnar í grunnin. Á hvørjum ári gekk 1 limur út, og nýggjur limur varð valdur.

Í 1986 varð reglugerðin fyri grunnin broytt soleiðis, at nevndin varð víðkað til 5 limir. Umframt teir 3 limirnar, sum løgtingið valdi, skuldi landsstýrið velja 1 lim og Listafólkasamband Føroya 1 lim. Limurin, sum landsstýrið valdi, varð valdur fyri 4 ár. Limurin, sum Listafólkasambandið valdi, varð valdur fyri 3 ár.

Nú spurningurin um val av nevndum og álitisfólkum hevur verið viðgjørdur av landsstýrinum, hevur valið av nevndini fyri Mentunargrunn Føroya Løgtings eisini verið viðgjørt.

Landsstýrið meinar, at rættari er, at allir limirnir verða valdir fyri líka langt tíðarskeið, og at valt verður eftir at landsstýrið er skipað.

Landsstýrið hevur somuleiðis umrøtt spurningin, hvussu rætt tað nú er, at eitt áhugafelag, sum í hesum føri Listafólkasambandið, er umboðað í nevndini, sum millum annað skal avgera, hvussu stórar veitingar skulu latast til umsøkjarar, har ímillum til

limir í feløgum innan Listafólkasamband Føroya - sínum egna felagi.

Landsstýrið hevur tó tikið ta avgerð, at Listafólkasambandið skal vera umboðað í nevndini á tann hátt, at Listafólkasambandið skal geva tilmæli um nevndarlim og tiltakslim til landsstýrið, sum síðani velur limin og tiltakslimin sum annan av sínum báðum limum ávikavist tiltakslimum.

Líknandi regla er galdandi í øðrum førum, millum annað tá ið limir skulu veljast í Skúlabókanevndina fyri Føroya Skúlabókagrunn. Reglan har er tann, at landsstýrið velur allar 5 limirnar og tiltakslimirnar, men 2 teirra verða valdir eftir tilmæli frá Føroya Lærarafelag og 1 teirra eftir tilmæli frá Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara.

Henda skipan hevur riggað væl, og heldur landsstýrið sostatt, at ein líknandi skipan er betur hóskandi, tá ið limir verða valdir í nevndina fyri Mentunargrunn Føroya Løgtings.

Hetta er orsøkin til, at landsstýrið hevur broytt reglugerðina fyri Mentunargrunn Føroya Løgtings soleiðis, at í staðin fyri at landsstýrið valdi 1 lim og 1 tiltakslim og Listafólkasamband Føroya 1 lim og 1 tiltakslim, velur landsstýrið nú 2 limir og 2 tiltakslimir, harav annan limin og tiltakslimin eftir tilmæli frá Listasambandi Føroya.

Á Føroya Løgtingi, 30. mars 1990

Signar Hansen
landsstýrismaður

løgtingsmaður.

F y r i s p u r n i n g u r

til

Olaf Olsen, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-25/1989: Viðvíkjandi starvsfólkaskervinum í føroyska heilsu-og almannaverkinum.

"Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur landsstýrið til tess at tryggja at tørvurin á útbúgnum starvsfólki innan føroyska heilsu-og almannaøki verður nøktaður?"

Viðmerkingar:

Ein fortreyt fyri einum vælvirkandi heilsuverki er at nógmikið av útbúgnum røktarstarvsfólki er tøkt.

Ásannandi hetta, varð tað at fíggjarnevndin í 1987, eftir tilmæli frá Ráðleggingarnevndini fyri føroyska sjúkrahúsverkið, játtaði pening til víðkan av næmingatalinum á Sjúkrasystraskúla Føroya.

Eisini varð játtan givin til sjúkrahjálpara/røktaru útbúgving á sama skúla.

Í sambandi við spariætlanir landsstýrsins hevur verið boðað frá, at nú skal bert ein næmingaflokkur árliga takast inn á Sjúkrasystraskúlan og at útbúgvingin av sjúkrahjálparum/røktarum ikki kemu at halda fram.

1.september 1989 varð tørvurin innan sjúkrahús og røktarheim t.d. á sjúkrasystrum heili 72 føst støv, sum ikki vóru sett. Umfram kemur so eisini avloysaratørvurin, sum eisini er sera stórur.

Eisini er tørvur á sjúkrahjálparum/røktarum.

Tá hugsað verður um útbyggingar á røktarheimsøkinum, sum eru settar í verk og tær sum í nærmastu framtíð verða tað, kemur tørvuri á nevndu starvsfólkabólkum at vaksa munandi.

Eisini má havast í huga, at tá landsstýrið í sambandi við sparingar hevur álagt avspákingar ístaðin fyri útgjaldingar, so kemur hetta náttúrliga at føra við sær øktan tørv fyri starvsfólki, at arbeiða, tá onnur avspáka.

Fráboðaðu tiltøk landsstýrsins á hesum øki mega metast ábyrgdarleys og beinleiðis skaðilig fyri føroyska heilsu-og almannaverkið og er tað umráðandi, at landsstýrið umhugsar spurningin og ger sær greitt avleiðingarnar av eini minkandi tilgongd av útbúgnum starvsfólki, samstundis sum starvsfólkakrevjandi útbyggingar verða framdar.

Skulu sjúklingum/búfólki verða tryggjað fullgóð(forsvarlig) kor undir innleggjan, so er fortreytin útbúgvi starvsfólk.

Tað sama ger seg galdandi innan primeru heilsuroktina.

Tá hesi viðurskifti eru sera álvarsom og viðkoma øllum borgarum landsins, er tað at spurningurin um støðu landsstýrsins verð reistur.

Á FØROYA LØGTINGI 28.03.1990

Tordur J. Niclasen

Olaf Olsen
landsstýrismaður

S v a r

uppá

fyrispurning frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-25/1989: Viðvikjandi starvsfólkatørvinum í føroyska heilsu- og almannaverkinum.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur landsstýrið til tess at tryggja, at tørvurin á útbúnum starvsfólki innan føroyska heilsu- og almannaøkið verður nøktaður?

****

Eg fari at geva harra Tordi Niclasen, løgtingsmanni rætt í, at fortreytin fyri einum vælvirkandi heilsuverki er, at nóg nikið av útbúnum starvsfólki er tókt.

Sitandi landsstýrið hevur, eins og landsstýrini frammanundan, tann politikk, at starvsfólk innan heilsu- og almannaøkið eiga at hava eina útbúgving, ið fakliga er á hædd við hana, sum starvsfólk í grannalondum okkara hava. Hetta ger, at vit eru bundin á nógvum økjum, hvat innihaldinum í sjálvari útbúgvingini viðvíkur. Tað, sum vit kunnu gera, er at geva møguleikar fyri útbúgving í tann mun okkum tørvar starvsfólk innan tey einstøku økini.

Vit hava nú fingið Landssjúkrahúsið góðkent sum læruplass fyri laborantnæmingar, og væntandi fer læruráðið skjótt at góðkenna Landssjúkrahúsið sum læruplass fyri læknaskrivarar.

Sjúkrahúsverkið rekur sjúkrasystraskúla, sum í 1989 hevði tveir flokkar av næmingum. Til fyrra flokkin, ið byrjaði í apríl, vóru bert 12 skikkaðir umsøkjarar, og til seinra flokkin, ið byrjaði í oktober, vóru tá avtodnaði bert 17. Av hesi orsøk og vegna sparikrøv, ið áløgd vórðu sjúkrahúsverkinum, avgjørdi leiðslan bert at hava ein flokk í 1990.

Sjúkrasystraskúlin hevur í seinastuni fingið fleiri fyrispurningar um útbúgvingina enn vanligt, og mett verður tí, at áhugin fyri útbúgvingini er vaksandi, men vegna niðurskurðin, sum hendur innan sjúkrahúsverkið, verða ikki fleiri praktikkpláss enn til útbúgvingina av tí eina flokkinum um árið.

Vegna tær sparingar, sum eru álagdar sjúkrahúsverkinum, verður neyðugt at fremja stórar broytingar innan sjúkrahúsverkið. Hesar broytingar fara væntandi at viðføra, at tørvurin á røktarstarvsfólki fer at minka. Sostatt merkir hetta, at tær sjúkrasystrar, ið verða útbúnar í framtíðini, allar so at siga fara at finna sítt starv innan almannaøkið, har tørvurin á røktarstarvsfólki væntast at vera framhaldandi.

Í Danmark er lagt fyri fólkatingið uppskot til lóg um útbúgving

av starvsfólki innan heilsu- og almannaøkið. Hetta uppskot broytir útbúgvingarnar munandi. Í hesum sambandi og við atliti til tær broytingar, ið fara at henda innan sjúkrahúsverkið, verður kannað, hvat skal gerast fyri, at ein føroysk sjúkrasystrautbúgving er fult á hædd við hana í londunum uttan um okkum, eisini við atliti til føroysk viðurskifti.

Givið er, at tær broytingar, sum sjúkrahúsverkið er farið undir, fara at hava stórt árin á útbúgvingina av røktarstarvsfólkum. Tað er einki at ivast í, at krøvini til røktarstarvsfólk verða størri í komandi tíð.

Innan læknaøkið ætlar sjúkrahúsverkið sær undir stórar broytingar.

Ein nevnd hjá danska heilsustýrinum (Iversennevndin) er komin til ta niðurstøðu, at ein stórur partur av teimum tíðaravmarkaðu hjálparlæknastørvunum eigur at verða gjørdur um til føst størv soleiðis, at bert so nógv hjálparlæknastørv verða eftir, sum tørvur er á, til tess at seta nýggjar serlæknar og kommunulæknar við.

Heilsumálaráðið hevur mælt til, at nevndarálitið skjótast møguligt verður veruleiki. Tað merkir, at longu frá 1. januar 1991 eiga sjúkrahúsini at hava lagt neyvar útbúgvingarætlanir fyri teir yngru læknarnar, og øll ætlanin skal vera veruleiki í seinasta lagi í 1997.

Hetta hevur við sær, at donsku amtini í løtuni eru við at gera útvið 3000 1. hjálparlæknastørv um til føst tænastumannastørv. So nógvir kvalifiseraðir læknar eru tó ikki tøkir (í løtuni bert umleið 1200).

Til tess ikki at gerast eftirbátur og harvið enda í læknatroti, ætlar sjúkrahúsverkið í Føroyum at gera núverandi 1. hjálparlæknastørv um til yvirlæknastørv skjótast møguligt.

Henda umlegging fer uttan meirkostnað at hava við sær, at tænastustøðið á sjúkrahúsverkinum fer at hækka munandi.

Nakrar sjúkrahúsdeildir á Landssjúkrahúsinum fara at fáa undirvísingaruppgávur innan ta sokallaðu turnusútbúgvingina (tað eru fyrstu 18 mánaðirnar eftir læknaprógv), útbúgving til kommunulæknar og møguliga introduktiónsútbúgving til serlækna. Sjúkrahússtjórin arbeiðir í løtuni við hesum ætlanum.

Sum tað skilst, av tí her er sagt, fer sjúkrahúsverkið at leggja fyri fíggjarnevndina uppskot um at seta umleið 10 nýggj yvirlæknastørv á Landssjúkrahúsinum í 1990, men samstundis verður talið á 1. hjálparlæknastørvum minkað tilsvarandi.

Á Føroya Løgtingi, 8. maj 1990

Olaf Olsen
landsstýrismaður

Jógvan á Lakjuni
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Ivan Johannesen, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-27/89: Viðvíkjandi p-talinum.

Hvørjar avleiðingar fær tað fyri teir borgarar, sum ikki hava latið peningastovnunum p-tal sítt tann 1. juni 1990?

Hví biðja myndugleikarnir borgararnar um at geva peningastovnunum eitt p-tal, sum myndugleikarnir sjálvir hava sett á hvønn einstakan borgara, og sum peningastovnarnir longu hava?

Hevði Líkningarráð Føroya lógarheimildir aftan fyri hesi – orð, sum stóðu í tí fyrra brævinum, dagfest 12. december 1988: "Eftir 1. december 1989 verður ikki loyvt at taka út av konti tygara ella at stovna nýggjar konti, tá ið persóntal tygara ikki er skrásett", og er hetta brævið annulerað?

Í samgonguskjalinum millum Sambandsflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin stendur, at reglurnar um nýtslu av p-talinum verða endurskoðaðar. Hvussu tulkar landsstýrið hesa avtalu? Hvat ætlar landsstýrið at gera við hetta, og hvussu langt er komið áleiðis?

Viðmerkingar:

Tann 12. december 1988 sendi Líkningarráð Føroya øllum føroyingum brøv, har fólk verða biðin um at fara á peningastovnarnar og upplýsa persóntal sítt. Brævið endaði við hesum orðum: "Eftir 1. desember 1989 verður ikki loyvt at taka út av konti tygara ella at stovna nýggjar konti, tá ið persóntal tygara ikki er skrásett."

Tann 22. november 1989 fingu allir skattaborgarar landsins aftur eitt bræv, og hesaferð er tað undirskrivað av Føroya landsstýri og Líkningarráði Føroya. Nú verða fólk vinarliga biðin um at upplýsa p-talið til teir peningastovnar, har tey hava konti, innan 1. juni 1990. Men hesaferð stendur eingi um, hvørjar avleiðingar tað fær, um fólk ikki geva peningastovnunum persóntal sítt.

Tí kundi verið áhugavert at fingið at vita, um Líkningarráð Føroya hevði lógarheimildir aftan fyri "hóttanirnar" í tí fyrra bræviunum, og hvørjar praktiskar avleiðingar tað fær, um fólk ikki lata peningastovnunum persóntal sítt.

Sjálvt um helst eingin orsøk er til at halda, at myndugleikarnir fara at misbrúka upplýsingarnar um viðurskifti borgaranna, og sjálvt um skráirnar hjá bæði Líkningarráðnum og peningastovnunum eru undir tí almenna skrásetingareftirlitinum, so er kortini orsøk at óttast.

Tað er ikki so undarligt, um fólk eru ørkymlað og bangin fyri skrásting, tí tá ið p-talið kom í 1983, varð sagt greitt og týðiliga, at tað bert skuldi nýtast til skatt, men longu nú er vikið frá hesum lýsti, og fólk spyrja sjálvandi, hvat tað næsta verður. Eru vit á veg móti einari skráseting, har øll viðurskifti og allar upplýsingar um hvønn einstakan kunnu samkoyrast?

Nógvir borgarar í okkara landi eru bangnir fyri hesi skráseting, tí teir føla, at her verður gingið ov nær tí persónliga frælsinum hjá tí einstaka. Hesir borgarar eru ikki bangnir fyri at geva myndugleikunum allar upplýsingar, tí tað hava teir altíð gjørt, nei, teir ræðast hetta "Big Brother is Watching you"-samfelagið, har "holdningurin" er, at tú ert ómerligur, til tú hevur prógvað tað mótsetta!

Ein annar spurningur, sum fólk seta sær, er hví myndugleikarnir biðja borgararnar geva eitt persóntal frá sær, sum myndugleikarnir sjálvir hava givið hvørjum einstøkum borgara. Fólk hava ikki biðið um nakað p-tal, og veruleikin er, at peningastovnarnir hava longu persóntalið hjá næstan øllum borgarum í landinum. Tey halda, at myndugleikarnir kundu bara gjørt eina lóg, sum loyvdi peningastovnunum at nýta p-talið, so kundu myndugleikarnir sjálvir givið teimum tað, um teir ikki høvdu tað frammanundan!

Í samgonguskjalið millum Sambandsflokkinum, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin varð niðurfelt: "Reglurnar um nýtslu av p-talinum verða endurskoðaðar", og áhugavert hevði verið at fingið at vitað, hvat landsstýrið ætlar at gera við hesa avtalu, og hvussu langt er komið við hesum endurskoðanum!

Á FØROYA LØGTINGI 28. mars 1990.

Jógvan á Lakjuni

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

S v a r

uppá

fyrispurning frá Jógvan á Lakjuni, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-27/1989: Viðvíkjandi P-talinum.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1) Hvørjar avleiðingar fær tað fyri teir borgarar, sum ikki hava latið peningastovnunum P-tal sítt tann 1. juni 1990?

2) Hví biðja myndugleikarnir borgararnar um at geva peningastovnunum eitt P-tal, sum myndugleikarnir sjálvir hava sett á hvønn einstakan borgara, og sum peningastovnarnir longu hava?

3) Hevði Líkningarráð Føroya lógarheimildir aftan fyri hesi crð, sum stóðu í fyrra brævinum dagfest 12.12.1988: "Eftir 1. desember 1989 verður ikki loyvt at taka út av konti tygara ella at stovna nýggjar konti, tá ið persóntal tygara ikki er skrásett", og er hetta brævið annullerað?

4) Í samgonguskjalinum millum sambandsflokkin, tjóðveldisflokkin og fólkaflokkin stendur, at reglurnar um nýtslu av P-talinum verða endurskoðaðar. Hvussu tulkar landsstýrið hesa avtalu? Hvat ætlar landsstýrið at gera við hetta, og hvussu langt er komið áleiðis?

****

Að 1): Í løgtingslóg nr. 54 frá 8. mai 1987 um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt er ásett í § 2, stk. 5, at ongin flyting skal fara fram av konti, har skráseting av persóntali ella arbeiðsgevaratali v.m. ikki er gjørd.

Hetta merkir, at peningastovnarnir hava skyldu til at stongja nevndu konti, til P-tal er upplýst.

Seinasta freist at skráseta P-talið er í frammanfyri nevndu lóg sett til 1. oktober 1987. Henda freistin er av praktiskum orsøkum seinri broytt til 1. juni 1990.

Að 2): Peningastovnarnir hava í dag ikki skrásett P-talið. Tekniskt og umsitingarliga hevði verið gjørligt at flutt nøkur P-tøl frá skattavaldinum til peningastovnarnar.

Grundin til at borgararnir verða beidnir um sjálvir at geva peningastovnunum P-talini saman við yvirliti yvir konti teirra, er at tryggja borgarar móti feilum. Tað er ein sannroynd, at nøvn og adressur á nógvum konti í peningastovnunum ofta eru ófullfíggjað, og verður tað tí nógv tryggast fyri borgaran, at hann sjálvur vendir sær til peningastovnin við P-tali og yvirliti yvir sínar konti.

Ad 3): Upplýsast skal, at Líkningarráðið hevði fulla lógarheimild fyri innihaldinum í nevnda brævi, samanber svarið til fyrsta spurningin.

Upplýsast kann, at hetta brøv varð skrivað av Líkningarráðnum og peningastovnunum í felag, men semja var um, at av praktiskum grundum skuldi Líkningarráðið senda brævið út.

Ad 4): Landsstýrið tulkar hesa avtalu soleiðis, at kannast skal, um nýtslan av P-talinum kann broytast, og hvussu tað kann verða tryggjað borgarunum, at P-talið einans verður nýtt til at røkja tær í lógini ásettu uppgávur.

Ásannandi, at tað í løtuni hvørki politiskt ella umsitingarliga ber til at gera broytingar í nýtsluni av P-talinum, samtykti landsstýrið í desember 1989 at senda borgarunum eitt brøv, har heitt verður á teir um at geva peningastovnunum P-talið í seinasta lagi 1. juni 1990.

P-talið kann nú nýtast til umsiting av skatti, frítíðarløn, bundnari uppsparing, trygdargrunni løntakaranna og barnastyrki. Til tess at tryggja, at P-talið bert verður nýtt til frammanfyri nevndu uppgávur, ið allar verða umsitnar av skattavaldinum, og ikki verður nýtt til tað, ið Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður, í viðmerkingunum kallar "Big Brother watching", hevur skattavaldið gjørt uppskot til trygdarreglur, ið Skrásetingareftirlitið hevur mælt landsstýrinum til at góðkenna.

Um broytingina í reglunum um upplýsingarskyldu hjá peningastovnunum kann verða upplýst, at orsøkin til hetta er ynski um at gera líkningina rættari og meira virkna.

Tá ið sagt verður, at líkningin verður rættari, verður hugsað um, at tað tá slepst undan óneyðugum feilum, ið henda í sambond við skriving og inntasting av lønarseðlum. Eisini fara bæði fyribilsskrá og endaliga uppgerðin at vera munandi rættari enn nú. Hetta merkir so aftur, at vanligu A-skattgjaldararnir fara ikki at fáa so nógvar broytingar, sum teir nú fáa. Eisini fara upphæddirnar fyri írestandi skatt og avlopsskatt at verða munandi minni, enn tær eru nú.

Tá ið sagt verður, at líkningin gerst meira virkin, kemst hetta av, at arbeiði, ið nú verður gjørt við hond, tá kann verða gjørt við maskinu.

At enda skal verða upplýst, at skattavaldið bert eina ferð um árið - og tað er í januar mánaði á hvørjum ári - fer at fáa tær

í skattalógini nevndu upplýsingar frá peningastovnunum. Tað er sostatt ikki talan um, at skattavaldið fer at fáa atgongd til skráir hjá peningastovnunum og harvið til kontoirnar hjá borgarunum.

Á Føroya Løgtingi, 19. apríl 1990

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

Tórður J. Niclasen
løgtingsmaður.

F y r i s p u r n i n g u r

til

Olaf Olsen, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-29/1989: Viðvíkjandi nýggjari VHF-støð

"Hvat úrslit hava samráðingarnar við danska Post-og Telegrafvæsenet viðvíkjandi tiltókum, ið bera um VHF-tænastuna her á landi, givið ?"

Viðmerkingar:

Hóast eina stóðug útbygging av VHF-tænastuni síðan 1965 er farin fram, so má tó ásannast, at lurtilíkindini kring landið als ikki eru nøktandi.

Her verður serliga hugsað um lurtilíkindi har tey eru ringast, eitt nú í djúpunum og inn í millum oyggjarnar norðanfyri.

Í apríl mánaða 1987 bevóu Samferðslunevndin fund við telefonverksstjóran og leiðarar á telegrafstøðini um hesi viðurskifti, sum útróðrarmenn høvdu gjørt vart við, og ásannaðu nevsir, at ávístu trupuleikarnir funnust, og vístu samstundis á, at neyðugt varð at fara upp í hæddina við møguligar nýggjari støð, um munagóður bæti skuldi síggjast.

Havandi trygdina hjá teim siglandi í huga, tók samferðslunevdnin upplýsingarnar frá telefon-og telegrafstjórunum til eftirtektar, og í uppskoti til samtyktar varð við 28-o atkvøðum heitt á landsstýrið um at taka upp samráðingar við danska Post-og Telegrafvæsenet viðvíkjandi spurninginum, um møguliga at fara upp í hæddina við nýggjari VHF-støð.

Tá gingin eru nú trý ár, síðan samtyktin varð gjørd, má sigast, at skotbráðið hevur verið ríkiligt og verður tí roknað við einum ítøkiligum trygdarfremjandi úrsliti av nevndu løgtingssamtykt.

Á FØROYA LØGTINGI 5.apríl 1990

 Tórður J. Niclasen

Olaf Olsen
landsstýrismaður.

S v a r

uppá

fyrispurning frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-29/1989 viðvíkjandi nýggjari VHF-støð.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Hvat úrslit hava samráðingarnar við danska Post- og Telegrafvæsenet viðvíkjandi tiltøkum, ið betra um VHF-tænastuna her á landi, givið?

****

Telefonverkið hevur havt fyrispurning hjá Post- og Telegrafvæsenet hesum viðvíkjandi og er niðurstøðan, at danska Post- og Telegrafvæsenet ikki er sinnað at bera kostnaðin av møguligari flytan ella uppsetan av eini nýggjari VHF sendistøð.

Telefonverkið hevur gjørt nakrar metingar av, hvat møguliga kann gerast fyri at betra um hesi viðurskifti.

Hjálagda kort 1 vísir, hvussu langt VHF sendistøðin á Eysturhøvda í Svínoy røkkur.

Kort 2 vísir, hvussu langt VHF sendistøðin røkkur, um hon verður flutt upp á Klubban á Fugloynni.

Kort 3 vísir, hvussu langt ein VHF sendistøð røkkur, um hon verður sett upp á Støðlafjalli í Eysturoynni.

Við tað at Telefonverkið er í ferð við at byggja eina radiostøð uppi á Klubbanum úti í Fugloy, er møguleikin til staðar at flyta VHF støðina frá Svínoy og út á Fugloy. Hetta vil betra um møguleikan at nýta VHF støðina beint norðan fyri Norðoyggjar, tó verður støðan í Djúpunum ikki nógv betur av hesi flytan.

Fyri at betra um líkindini í Djúpunum, er neyðugt at seta eina nýggja VHF støð upp. Møguleiki er at seta hesa umm á Støðlafjalli, har telefonverkið frammanundan hevur smáttu standandi.

Kostnaðurin av at flyta VHF støðina frá Eysturhøvda og út á Klubban verður mettur til 200.000 kr.

Keyp og uppseting av eini nýggjari VHF støð á Støðlafjalli verður mett at fara at kosta um 1.250.000 kr.

Mettur rakstrarkostnaður av eini nyggjari VHF sendistøð verður um 200.000 kr. árliga.


Post- og Telegrafvæsenet hevur boðað frá, at teir ikki rinda fyri broyting ella víðking av verandi VHF skipan í Føroyum, herundir eyka rakstrarkostnað.

Landsstýrið fer í næstum at taka støðu til, um viðmælast skal løgtinginum at gera hesar íløgur til tess at betra um radiosambandið á hesum økjum, og til tað, sum hetta fer at kosta í eyka rakstrarútreiðslum.

Á Føroya Løgtingi, 25. mai 1990

Olaf Olsen
landsstýrismaður

KORT 1




MVHF dekningen Eksklusiv

▣ : Grotun Dekningen

▣ : Tolulsjon Dekningen

□ : Vanasjon \ Ensjon dekningen

KORT 2




MVHF dəkənnigun klublərin

: Gətün dəkənnigun

: Təlubigun dəkənnigun

: Vanədigun\Ərəgün dəkənnigun

KORT 3



MVRF Jehningen Stöllhjell.

⁞⁞ : Grönn Dehningen.

⁘ : Tolegen Dehningen.

□ : Vanalegen Einigen dehningen

løgtingsmaður.

F Y R I S P U R N I N G U R

til

Jógvan Sundstein, løgmann

Løgtingsmál nr. 100-30/1989: Viðvíkjandi arbeiðsskapandi tiltøkum.

Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur landsstýrið at seta í verk arbeiðsskapandi tiltøk, sum fyribyrgja/minka um tað støðugt vaksandi arbeiðsloysi her á landi ?

Viðmerkingar:

Ein avleiðing av forda politikki landsstýrisins er, at eitt støðugt vaksandi arbeiðsloysi hevur tikið seg upp her á landi.

Hóast tað frá landsstýrisins síðu støðugt hevur verið noktað fyri at so er, má hesin veruleiki nú síggjast í eygunum!

Avleiðingar av eini støðugt vaksandi arbeiðsloysisbylgju vilja altíð verða svárar. Ráðloysi tekur seg upp millum teirra, ið rakt verða, og tá fólk missa hús og heim gerast tær sosialu og menniskjaligu avleiðingarnar sera daprar og koma samfelagnum lættliga aftur um brekku.

At arbeiðsloysi rekur fólk av landinum er væl skiljandi og ikki ókent fyribrigdi aðrastaðnis.

Hóast Kristiligi Fólkaflokkurin á tingi ábaldandi hevur roynt at vist á vandan við arbeiðsloysi og havt uppskot til loysnir - t.d. at veita Húsalánsgrunninum støðri likviditet, at víðka játtanina til landsverkfrøðingin v.m., sýnist hesar royndir okkara tíðarvorri at hava verið til fánýtis.

Nú tykist støðan so álvarsom, at landsstýrið eigur ikki at drála longur, men beinanvegin taka neyðug stig til arbeiðsskapandi tiltøk, til tess at fyribyrgja at ein sonn vanlukka rakar land og fólk.

Eisini má nú fáast at vita hvørjar møguligar ætlanir landsstýrið hevur hesum viðvíkjandi.

Á FØROYA LØGTINGI 4. mai 1990

Tordur J. Niclasen

Jógvan Sundstein
løgmaður.

S v a r

uppá

fyrispurning frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, í tingmáli nr. 100-30/1989: Viðvikjandi arbeiðsskapandi tiltøkum.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

"Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur landsstýrið um at seta í verk arbeiðsskapandi tiltøk, sum fyribyrgja/minka um tað støðugt vaksandi arbeiðsloysið her á landi ?"

****

Fyrst nakrar almennar viðmerkingar til tær grundgevingar spyrjarin hevur fyri spurninginum. Byrjað verður við at siga, at "ein avleiðing av førda politikki landsstýrisins er, at eitt støðugt vaksandi arbeiðsloysi hevur tikið seg upp her á landi".

Hetta arbeiðsloysi - sum tó ikki er stórt, sæð í mun til mong onnur lond - er ein avleiðing av tí politikki, sum fardur hevur verið í fleiri ár frammanundan.

Figgingin av føroyska samfelagnum hevur sæð soleiðis út:

Útflutningur	x
Danskur stuðul	x
Lántøka	x
	xxx

Í fleiri ár hevur útflutningurin nærum verið hin sami, stívliga 2 mia. kr. árliga. Danski stuðulin hevur verið 6 - 800 mió. kr. árliga, meðan lántøka hevur fíggjað restina av nýtsluni.

Hendan lántøka er frá 1. januar 1985 til 1. januar 1989 økt frá 3,1 mia. kr. til 7,7 mia. kr. ella alt alt 4,6 mia. kr. Samstundis sum hendan upphædd hevur fíggjað nýtslu og iløgur, hava hesir lánimøguleikar gjørt tað møguligt at avlaga búskapin tilsvarandi. Tá ið so hesir møguleikar, sum ikki kundu halda fram longur, minkaðu, mátti tann stóri eftirspurningur eftir arbeiðsmegi eisini minka.

Høvuðsuppgávan hjá landsstýrinum hevur tí verið at skapa javnvág aftur í búskapin og so vítt gjørligt uttan ov stórt arbeiðsloysi. Um vit ikki royndu at útvega hesa javnvág, men tíl dømis bara hildu fram við sama politikki, sum fardur hevði verið, so hevði samfelagsbúskapurin heilt sorast sundur, og stórt arbeiðsloysi hevði verið ein av fylgjunum.

Neyðugu tiltøkini hava tí verið:

1. Sparingar á fíggjarlógini.

2. Lækkan av almennum íløgum til meira rimiligt støði.
3. Lækkan av privatu íløgum til rímuligt støði.
4. Størri samansparing.

Men hetta er sjálvandi ikki nóg mikið. Tað skulu eisini vera <u>ítøkiligar ætlanir</u> um nýggjan vøkstur í búskapinum, har javnvág er millum framleiðslu, íløgur og nýtslu. Eg skilji spurningin hjá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni at snúgva seg um hesi viðurskifti.

Her skulu tí nevnast nakrar av teimum ætlanum landsstýrið hevur arbeitt við, og sum eru komnar nakað áleiðis:

1. Høvuðsgrundarlagið undir varandi arbeiðsskapandi virksemi er betri umstøður hjá høvuðsvinnuni og harav standandi framleiðsla. Tey tiltøk, sum nevnd eru í fiskivinnuuppritinum, og sum nú fleiri hava fingið lógarform, eru tí av alstórum týdningi fyri búskaparligari framgongd.

2. Marknaðarviðurskifti okkara og harvið betri sølumøguleikar, hægri prísir og smærri tollhindringar økja eisini um arbeiðsmøguleikarnar. Landsstýrið samráðist í løtuni við EF um nýggjan handilssáttmála, sum vónandi og væntandi gevur okkum betri sømdir á hesum øki.

3. Í tinginum liggur lógaruppskot frá landsstýrinum um stuðul til føroyskar skipasmiðjur til bygging av farma- og fiskiskipum, fyri ein stóran part til útflutnings. Hetta kemur við teim ordrum, sum skipasmiðjur kunnu vænta sær, at geva arbeiði til nógvar hendur, helst eini 100-150 fólk.

4. Landsstýrið hevur sett sær fyri at hava javnvág í almennum íløgum, og roynir at halda hesum á einum støði svarandi til 550 mió. kr. árliga.

5. Tað meiri normala búskaparliga virksemið fer so helst at hava við sær, at privata íløguvirksemið økist aftur, og hetta kemur so eisini at hava við sær ein ávísan økstan eftirspurning eftir arbeiðsmegi.

6. Ætlanin um, at Húsalánsgrunnurin fær meiri kapital og tí øktan møguleika fyri størri parti av sethúsafíggingini eru komnar rættuliga langt. Væntast kann tí, at sethúsabyggingin aftur fer at økjast.

7. Nakað av arbeiði til vegagerð við eini eykajáttan av reguleringskonto uppá ca. 25 mió. kr. verður helst sett í verk heilt skjótt.

8. Kanningar eru gjørdar av møguleikunum fyri at lækka lønir og skatt við somu upphæddum. Ítøkilig uppskot um at gjøgnumføra hetta eru ikki gjørd enn. Men verður tað sett í verk, førir tað nógv arbeiðsvirksemi við sær.

Á Føroya Løgtingi, 22. mai 1990

Jógvan Sundstein
løgmaður

Farloyvi

29. juli 1989 varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at Heðin Mortensen tekur sætið á tingi fyri Paula Ellefsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

19. september 1989 varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at Jørgen Niclasen tekur sætið á tingi fyri Svend Aage Ellefsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

26. september 1989 varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at Finn Dam tekur sætið á tingi fyri Agnar Nielsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

3. oktober 1989 varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Bjarni Djurholm tekur sætið á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi.

17. oktober 1989 varð við 19-0 atkvøðum samtykt, at Hilmar Bech og Bjarni Djurholm taka sætið á tingi fyri Atla P. Dam og Eliesar Arge, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

7. november 1989 varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Mamy Dahl Sørensen tekur sætið á tingi fyri Vilhelm Johannesen, sum í skrivi bað um farloyvi.

12. desember varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Bjarni Djurholm tekur sætið á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi.

11. januar 1990 varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Hilmar Bech tekur sætið á tingi fyri Atla P. Dam, sum í skrivi bað um farloyvi.

14. februar 1990 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at Frederik Olsen, Jákup Mikkelsen og Bjarni Djurholm taka sætið á tingi fyri Lasse Klein, Jógvan við Keldu og Óla Breckmann, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

23. februar 1990 varð við 20-0 atkvøðum samtykt, at Hilmar Bech tekur sætið á tingi fyri Atla P. Dam, sum í skrivi bað um farloyvi.

13. mars 1990 varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Uuul Jacobsen og Heðin Mortensen taka sætið á tingi fyri Tord J. Niclasen og Paula Ellefsen, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

21. mars 1990 varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at Helgi Abrahamsen og Bjarni Djurholm taka sætið á tingi fyri Edmund Joensen og Eliesar Arge, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

3. apríl 1990 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at Kári Kjælnes tekur sætið á tingi fyri Niels Paula Danielsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

19. apríl 1990 varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Ernst Kass tekur sætið á tingi fyri Tórbjørn Poulsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

24. apríl 1990 varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at Hilmar Bech tekur sætið á tingi fyri Atla P. Dam, sum í skrivi bað um farloyvi.


2. mai 1990 varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Johannes Martin Olsen tekur sætið á tingi fyri Jákup Lumhauge, sum í skrivi bað um farloyvi.

25. mai 1990 varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at Erna Háberg tekur sætið á tingi fyri Eliesar Arge, sum í skrivi bað um farloyvi.

17. juli 1990 varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at Dan Nielsen og Ernst Kass taka sætið á tingi fyri Hergeir Nielsen og Tórbjørn Poulsen, sum í skrivi bóðu um farloyvi.


19. juli 1990 varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Heðin Mortensen tekur sætið á tingi fyri Paula Ellefsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22



Sosialinum at um man dublaði fiskaprísirnar so dublaði, man inntøkurnar á fíggjarlógina og har er ein grundleggjandi misskiling, at nú hava javnaðartingmennn altíð fokusera á aðra síðuna á fíggjarlógini nevniliga útreiðslusíðuna, teir hava ongartíð haft eyguni fyri inntøku síðuni, og inntøkusíðan á fíggjarlógini er ikki útflutningur, hann hevði vaksið til tað dupulta um fiskaprsirnir voksu. Nei inntøkusíðan á fíggjarlógini, tað er skattur og tollur, eftir planinum fyri 1990 so er tað 12 hundrað mió. í skatti og 11 hundrað mió í tolli, og um tú skalt dubla inntøku síðuna á fíggjarlógini so skalt tú hækka skatt, tú skalt hækka toll ella í hvussu so er annað av teimum, samanlagt skal tað hækkast.

Tað sum eg vil ger vart við, tað er tað, at eg ætlí mær slet ikki at verða til at fara og hækka munandi toll og skatt tað nærmastu tíðina, og tí er bara ein máti, tað er at vit finna út av um vit í hesi samgonguni eru førir fyri, at minka útreiðslurnar eitt sindur meir fyri 1990 enn her er fyrisligið, og nógv meir í 1991. Eg vil siga fyri mín part skyld, at hettar her eitt kardinalpunkt, eg meini at hettar her er líkasum tann frysti málapelurin í hesi samgonguni, vit skulu finna út av um vit kunnu fáa eina fíggjarlóg, sum vit sjálvur trúgva uppá kann venda gongdini í Føroyum, og um vit ikki fáa eina sovorðna, ja so spurningurin um tað er nøkur sum helst ide í at halda fram við einum landsstýri, tí tað skal fáast eitt landsstýri í Føroyum, sum kann venda fíggjarligu gongdini, og eitt vita vit tað verður ikki eitt landsstýri undir leiðslu av javnarðarflokkinum sum kemur at gera tað, tað er heilt sikkurt. Javnaðrflokkurin hevur koyrt tað føroyska samfelagið fíggjarliga fast tvær ferðir innan fyri tiggju ár, og tað er væl kent serliga innan fyri virkir. Vit lesa tað f. eks í donskum bløðum tá íð virkir fara av knóranum (konsern). Man setur ongantíð ein stjóra til at reorganisera eitt, sum hevur koyrt tað fallitt tvær ferðir, tað ber ikki til. Man tekur altíð aðrar, sum hava víst hegni til sovorin viðurskiftir og spurningurin fyri mær at siggja er: hava vit í samgonguni hettar hegnið, vit í sambandsflokkinum ætla, eg vil biðja

tykkum leggja til merkist, eg eri ikki farin í detaljir við viljа, hettar eru ting sum vit skulu tosa um, nú bleiv eg
tilnevndur í áðni av formanni javnaðarfloksins fyri einsamallur at hava bestemma hvat skal henda og hattar er sjálvandi heilt burtur við. Eg havi ikki so mikið sum verið á samgongufundi enn, og tað sum eg fyristilli mær, tað er í samband við viðgerðina av fíggjarlógina í fíggjarnevndini, so roknið eg við at løgmaður tekur seg og sigur lat okkum fáa hasar mennirnar inn sum stuðla okkum, lat okkum hava ein ella tveir samgongufundir við okkara fíggjarnevndarumboðum, lat okkum diskutera hesi tingini, lat okkum fáa eitt uppskot sum vit allir kunnu taka undir við og sum vit kunnu verða bekentir. Takk fyri.

Ivan Johannesen landsstýrismaður (sb.)

Harra formaður

Nú hava framsøgurennirnir havt orðið, og eg vil takka fyri eina sakliga viðgerð, tað er kanska ikki øll ting teir hava verið samdir um, men eg haldi tað hevur verið ein ógvuliga saklig viðgerð.

Eg ætli mær ikki at siga rættuliga nógv, eg haldi at í tí, sum varð framlagt í fíggjarlógaruppskottinum har havi eg sagt sum eg havi at siga.

Um vit taka tað sum fíggjarlógin hesi fer javnvigar við 3 mia.111 mió. kr. og tað sum hon javnvigaði við seinast fyri 1989 so er tað ein beinleiðis sparing uppá 86,6 mió., men vit vita eisini tað eru ávísar inntøku lógir gjørdar í hesum her árinum soleiðis at forbrúkið hevur verið ella verður 195 mió. kr. større, so um vit takað munin har, so er tað ein munur uppá 281,6 mió. kr..

Nú hava vit hettar her fíggjarlógaruppskotið til viðgerðar og tað var Arnfinn Kallsberg, sum var her. Hann segði tað bleiv ein kampur at fáa fíggjarlógina at halda, tað er møguligt tað verður, men eg haldi hann eisini skal hyggja eftir, um tað møguligt at vit fingu onkrar aðrar sparingar eisini afturat, annars fari eg at

biðja hann um at verða ógvuliga varnan og heldur innkalla stovarnar og kanska landsstýrismennirnar um teir skulu gera broytingar, ti eg haldi man hevur stramma tað rættuliga nógv, tá ið man viðgjørdi fíggjarlógaruppskotið, men eg skal samstundis viðganga at tað kanska var nakað stutt tíð til at koma út í detaljir við øllum.

Tað sum hendan her samgongan hevur sett sær fyri, tað er at skipa so fyri at í hesum samlaða húsarhaldinum, sum eitur Føroyar so skal tað hanga saman búskapriliga, soleiðis at inntøkur og útreiðslur tað samsvarar. Tað er soleiðis at tað eru tvær leiðir sum gangast kunnu og tað er at økja um inntøkuna og at minka um útreiðslurnar, og er tað tí samgongurnar ætlan at økja um inntøkurnar, skapa møguleikar fyri at vinnulívið skal koyra, soleiðis at inntøkurnar koma á trygt støði og tí ætla vit at økja inntøkurnar so nógv, sum tað á nakran hátt er gjørligt og samstundis at avmarka nýtsluna soleiðis at vit aftur fáa eitt gott og sunt samfelag at liva í.

Eg fari at loyva mær at gera onkrar viðmerkingar til opkkum sum hevur verið sagt.

Tað var Atli Dam sum siteraði meg fyri at hava sagt um hettar marglæti hjá javnaðarflokkinum, tað stó á forsíðuni í einari Dimmalætting, eg haldi eg havi sagt akkurat soleiðis, tað er farið. So sigur Atli Dam at var skeivt við hesum her inntøkulógunum, tað var skeivt at taka bundna uppsparing og tað má eg siga at har skilji eg ikki Atla Dam, tí áðrenn henda her samgongan varð skipa, so var soleiðis at vit vóru greiðir yvir at tað bleiv ein nokk so stórur likviditets trupuleiki, tað var. Heilt tíðuliga at okkara samfelag var við at koyra fast og tað trúgvi at allir politikarar í Føroyum vistu, serliga teir sum sótu áðrenn hettar her landsstýrið kom út har. Tað sum inntøkulógirnar fyri 1989 beinleiðis eru orsøk til, tað er fyri at fáa likvitetet til okkara samfelag soleiðis at tað ikki stoðgaði upp. Hettar er tað sum er tann kaldi veruleikin. Tað varð eisini nevnt hettar her av Atla Dam um rentuspekulatónin , og hann segði eisini hettar her var lóligt við hesi rentu-

spekulatiónini og tað er tað eisini, tá kann man spyrja, hví gjørdi hann einki við hendan her spurningin, tá hann var greiðir yvir cina rentuspekulatión, hví varð einki gjørt við tað. Eg kann siga somikið at landsstýri arbeiðir við hasum spruninginum, komið rættuliuga langt í hasum spurninginum, tí vit mugu fyrst finna útav um tað hevur nakað við verumleikan at gera, og tað er komið nokk so nær, tað kann eg siga.

So var tað æraði tinglimurin Tordur Niclasen, sum var uppi her. Hann tosaði nokk so nógv um hettan her pískin sum sambandsflokkurin gekk og sveiggjaði við, og pískaði allar hinar samstarvspartarnar í landsstýrínum. So var tað hettar her at man var lagstur eftir løntakaranum og fiskimanninum við hesum her inntøkulóginum. Nú havi eg í mínum hugaheimi spekulerað yvir hendan her Kristiliga fólkaflokkin síðan hann kom á ting. Tann niðurstøðan sum eg eri komin til, tað er tað at teir hava haft ein nokk so einvísan politik, og tað er bara at leggja meir og meir byrðar á fólk, hettar her at hugsa um hvar pengarnir skulu koma frá, tað havi ongantíð hoyrt teir snakka um, so at tað hevur verið nokk so eintáttaður politikkur, ið hesin flokkurin hevur koyrt eftir mínari metan. Tað skal ikki sparast. Vit hoyrdu æraða tinglim Tordur Niclasen, han var uppi her, tað skuldi ikki sparast, og tað skuldi ikki takast peningu inn, so segði hann, eg veit ikki um hann rópti tað hart, men hann segði í hvussu so er tað, at búskaparstøðan er ikki góð. Tað segði hann einaferð, so eg dugi ikki at skilja at um man ikki skal taka inntøkur inn frá fólkinum og man skal ikki spara, so dugi ikki ordiliga at siggja hvussu man skal kona burtur úr hesum at búskaparstøðan er ikki góð. So tosaði hann nakað um rossahandlar innan fyri samgonguna. Eg kundi gott tonkt nær at fingi, at vita hvar tað er farið fram í hvussu so er havi eg ikki sæð nakran rossahandil, eg havi ikki verið við til nakran rossahandil. So tað hevur áhuga.

Tað var ein spurningur, nú kann eg gott svara uppá hann, men eg haldi hann var meiri rættaður til Olaf Olsen, men eg haldi eg havi fingist eitt lítið sindur meiri við tann spurningin, eg kann gott svara Tórd

Niclasen uppá hann. Tað var hettar her lánitilboðið til aluvinnuna, tað er rætt, at tað er komið eitt tilboð um rættuligar stórar pengar til landskassan, og tað er komið til aluvinnuna og til íðnaðin og eisini til skipini. Vit hava í landsstýrinum eina tíð prøvað at kanna hendan her spurningin og eg skal siga somikið, at tað sísta íð er farið fram í tí málinum, tað var í gjár, hvar í vit høvdu fund, landsstýrið hevði fund við hesar her mennirnar, sum umboðað hesí her tilboðini til alívinnuna og samfelagið sum so, men kanningin er ikki liðug, so at landsstýrið arbeiðir við hasum har spurninginum og er komið rættuliga langt við hasum har spurninginum, so mikið kann eg svara upp á.

Harra formaður

Nú var Lasse Klein ein av hesum her framsøgumonnunum fyri sjálvstýrisflokkin. Tá íð eg fyristilti mær hettar her, at á tingboði so liggur ein fíggjarætlan ella ein fíggjarlóg sum ber ávísar sparingar í sær, so varð eg rættuliga forvitin eftir at fáa at vita hvar í sjálvstýrisflokkurin stóð í hesum her spariltøkunum, sum vit arbeiða við, og har má eg viðganga at eg varð eitt sindur skuffaður, eftir ti sum Lasse Klein segði so vilja teir í hvussu uppí tann vognin sum hevur sparingar á ætlanini, tí tað sum hevur sermerkt sjálvstýrisflokkin øll árini ,íð eg havi sitið á tingi, eg havi sitið 10 ár á tingi, tað hevur nemliga verið hettar her, at teir hava verið við serliga tá sovorðin tiltøk hava verið frammi, hettar her at man vil sparað. Takk fyri harra formaður.

Løgmaður

Harra formaður.

Tað, sum er til viðgerðar, er fíggjarløgtingslógin fyri 1990 og løgmansrøðan á ólavsøku, og hetta verður so nú tikið undir eini viðgerð soleiðis, sum tað hevur verið gjørt tey seinastu 2 árini, síðani fíggjarárið varð broytt til álmanakkaárið. Røðararnir frammanundan, framsøgumonninir fyri allar flokkar, hava havt orðið og hava sagt tað, sum teir væl fyrst og fremst hava upp á hjartað, og sum eg gangi út frá, er tað, sum er fremsti

Niclasen uppá hann. Tað var hettar her lánitilboðið til aluvinnuna, tað er rætt, at tað er komið eitt tilboð um rættuligar stórar pengar til landskassan, og tað er komið til aluvinnuna og til íðnaðin og eisini til skipini. Vit hava í landsstýrinum eina tíð prøvað at kanna hendan her spurningin og eg skal siga somikið, at tað sísta ið er farið fram í tí málinum, tað var í gjár, hvar í vit høvdu fund, landsstýrið hevði fund við hesar her menningarnar, sum umboðað hesi her tilboðini til alivinnuna og samfelagið sum so, men kanningin er ikki liðug, so at landsstýrið arbeiðir við hasum har spurninginum og er komið rættuliga langt við hasum har spurninginum, so nikið kann eg svara upp á.

Harra formaður

Nú var Lasse Klein ein av hesum her framsøgumonnunum fyri sjálvstýrisflokkin. Tá ið eg fyristilti mær hettar her, at á tingborði so liggur ein fíggjarætlan ella ein fíggjarlóg sum ber ávísar sparingar í sær, so varð eg rættuliga forvitin eftir at fáa at vita hvar í sjálvstýrisflokkurin stóð í hesum her spariltøkunum, sum vit arbeiða við, og har má eg viðganga at eg varð eitt sindur skuffaður, eftir tí sum Lasse Klein segði so vilja teir í hvussu uppi tann vognin sum hevur sparingar á ætlanini, tí tað sum hevur sermerkt sjálvstýrisflokkin øll árini ,ið eg havi sitið á tingi, eg havi sitið 10 ár á tingi, tað hevur nemliga verið hettar her, at teir hava verið við serliga tá sovorðin tiltøk hava verið frammi, hettar her at man vil sparað. Takk fyri harra formaður.

Løgmaður

Harra formaður.

Tað, sum er til viðgerðar, er fíggjarløgtingslógin fyri 1990 og løgmansrøðan á ólavsøku, og hetta verður so nú tikið undir eini viðgerð soleiðis, sum tað hevur verið gjørt tey seinastu 2 árini, síðani fíggjarárið varð broytt til álmanakkaárið. Røðararnir frammanundan, framsøgumenninir fyri allar flokkar, hava havt orðið og hava sagt tað, sum teir væl fyrst og fremst hava upp á hjartað, og sum eg gangi út frá, er tað, sum er fremstí

boðskapur hjá teimum ymisku flokkunum. Tað plagar í øllum førum at vera soleiðis, at framsøgumaðurin fyri ein flokk, tann fyrsti, sum hevur orðið undir eini slíkari stórari viðgerð sum hesi, sigur tað, sum flokkurin veruliga hevur á hjartað.

Eg haldi, at eg fyrst og fremst fari at takka framsøgumonnunum fyri landsstýrisflokkarnar fyri teirra viðgerð av hesum máli. Eg haldi, at teir hava allir havt eina positiva merking í øllum tí, ið teir hava sagt. Teir hava lagt ein góðan vilja í orðini, og teir hava ført fram, at tað, sum henda samgonga hevur í sínum politikki, er nakað, sum flokkarnir standa aftanfyri, og tað er nakað, sum teir meina verður til frama fyri hetta samfelagið.

Síðani haldi eg eisini, at eg fari at takka framsøgumanninum fyri Javnaðarflokkin Atla Dam fyri tað, sum hann segði. Gott nokk hevði hann nøkur úttalilsir, sum vit kanska kunnu kalla heldur skemtilig, kanska vit kunnu siga, tey vóru eitt sindur spotsklig av og á, men kortini, so haldi eg, at tá man fór at analysera røðu hansara, so mugu vit viðganga, at hon innihelt nakað av tí sama, nevnliga tað, sum samgongan var við at gera, tað var nakað, sum var neyðugt fyri hetta samfelagið. Hann viðgekk m.a. eisini tað, at tað, sum samgongan frammanundan, har, sum hann var løgmaður, tað, sum hevði gjøgnumført, at sumt av tí var ov mikið avgjørt og at tað vóru trupulleikar, sum henda samgongan nú arvaði frá táverandi samgongu, og eg haldi, at tað er rættiliga týdningarmikið at leggja merki til, at núverandi andstøðuleiðarin, fyrrverandi løgmaður viðgongur hetta. Tað er rættiliga fundamentalt í allari viðgerðini av okkara fíggjarligu støðu og tað er rættiliga fundamentalt av tí politisku viðgerðini av allari støðuni hjá okkara samfelag, at hetta verður sligið fast, at tann størsti andstøðuflokkurin viðgongur, at har eru ávísir trupulleikar, og at hann eisini viðgongur, at í øllum førum summir av hesum trupulleikunum stava frá tí, sum hendi tey seinastu árini. Verður hetta tónin, verður hetta lagið í tí politiska arbeiðinum, so havi eg ikki so ringar vónir um, at tað fer at eydnast at skapa nakað

nýtt, at skapa nakað betri, at gera nakað fyri at koma burtur úr hesi støðu, vit eru í í løtuni.

Tá ið vit taka føroyska samfelagið sum heild, so vita vit, at bæði tað føroyska samfelagið og í og fyri seg eitt og hvørt annað samfelag hava nakrar inntøkur, sum koma inn í samfelagið. Alt eftir hvat slag av samfelag stórt ella lítið samfelag, um tað er eitt samfelag við stórari og margfaldari framleiðslu ella ikki, so kann tað vera ymiskt, hvussu nógv, ið er av inntøkum og hvørji sløg av inntøkum, ið eru. Men taka vit okkara samfelag, so vita vit, at tær inntøkur, sum koma inn í okkara samfelag uttanífrá, tað eru 3 sløg av inntøkum.

Tað fyrsta slagið av inntøkum, sum kemur til samfelagið, er tað, sum vit fáa fyri okkara útflutning, okkara útflutningur gevur eina ávísa inntøku til Føroyar til samfelagið Føroyar, og henda inntøka er onkustaðni millum 2 og 2,5 mia.kr. Vónandi kemur hon upp á 2,5 ella kanska eitt sindur yvir 2,5 mia.kr. fyri 1989, og tað er helður meira, enn hon var í 1988.

Tað næsta slagið av inntøkum, sum kemur uttan í frá til Føroyar, tað er stuðulin frá tí danska statinum. Tað er upphædd, sum er umleið 800 mió.kr.

Tað triðja slagið av inntøkum, og tá ið eg tosi um inntøku, so er tað innflutningur av peningi, tað er lántøka, og lántøkan hevur tey seinastu árini ligið umleið 1 mia.kr. fyri hvørt árið.

Um vit nú hyggja at hesum inntøkum til landið og analysera tað eitt lítið sindur, so kunnu vit fyrst siga, at tann týdningarmesta og mest avgerandi inntøkan er nú okkara útflutningsinntøka, tað er tann inntøkan, sum stavar frá framleiðslu í landinum, og henda framleiðsla vísir seg við, at vit fáa útlendskan valuta, vit fáa pengar inn í landið, og hon hevur longu í síni framleiðslu, í síni framkomu verið í cirkulatión í landinum. Tí er tað tann mest týdningarmikla inntøkan fyri samfelagið.

Hin næstmest týdningarmikla inntøkan fyri samfelagið er lántøka. Lántøka kann verða góð og hon kann verða sunn. Lántøka, sum hevur sum grundarlag íløgur, íleggingar í framleiðslutól, sum hevur sum grundarlag

íløgur í tól, sum eru neyðug í samfelagnum. Tá ið eg so hugsi um framleiðslu, so er tað framleiðsla í víðari merking, so kann hon vera bæði góð og sunn, og hon førir eisini við sær nýggja framleiðslu og nýggjan fíggjarligan vøkstur í samfelagnum. Men henda inntøkan kann gerast ov løtt at fáa fatur á, og hon kann gerast ov stór og ov ógvuslig fyri samfelagið, tí tað er jú peningur, sum skal rindast aftur, og tað er tað, sum er hent hjá okkum, at lántøkan var góð og hon var ein partur av teimum lánum, vit hava tikið. Tað hevði stóran týdning fyri samfelagið, men hon tók yvirhond, hon gjørdist ov stór, og framleiðslan í samfelagnum stóð ikki mát við hesa lántøku, sumt av tí fór til framleiðsluíløgur, sum ikki kundu bera seg og hvar bara afturrindanin var eftir, meðan framleiðslan varð burtur.

Tann triða inntøkan fer beinleiðis í landskassan úr statskassanum og er ein sokallað yvirføringsinntøka, ein inntøka, sum ikki í síni grund gevur framleiðslu, men sum sjálvandi aftaná, at hon er komin inn í samfelagið fer í cirkulatión og síðani sjálvandi eisini er við til vøkstur og við til fíggjarligt virki í landinum. Tað er tann av inntøkunum, sum hevur minst beinleiðis ávirkan og týdning fyri samfelagið, sjálvt um man sjálvandi ikki skal undirmeta hana í tí samlaða føroyska búskapinum, sum hann er í dag.

Hesar samlaðu inntøkur skulu so cirkulera í tí føroyska samfelagnum. Uppgávan hjá politikarunum er so at vera við til at stýra samfelagnum, vera við til at ávirka gongdina herundir eisini ta búskaparligu gongdina í landinum soleiðis, at hon er mest til frama fyri okkara land og okkara fólk. Eitt av teim mest týdningarmiklu amboðunum er tað, sum løgtingið beinleiðis ræður yvir, tað er nevnliga fíggjarlógin og tað, sum gongur í gjøgnum landskassan, og ta ávirkan, løgtingið annars hevur við síni lóggávu á alment virksemi og eisini í ein ávísan mun á tað privata virksemið við teimum møguleikum, man hevur fyri at stýra peningaflutninginum og m.a. eisini at stýra lántøku til okkara land og okkara samfelag.

Nú hevur tað verið ført fram í orðaskiftinum og

ikki minst í tað seinasta hálva árið, vit hava eina ógvuliga stóra uttanlandsskuld sæð í mun til fólkatalið. Vit hava eina uttanlandsskuld upp á 6,7 mia.kr., var hon uppgjørd til ultimo 1988. Tað er stórt, tað er nógv sæð í mun til fólkatalið hjá okkum. Nú er uttanlandsskuld í sær sjálvum eisini bruttotalið ikki nakað eintýtt hugtak, tí tað veltst um, hvat tað er brúkt til, og hvørja ávirkan tað fær, soleiðis sum eg nevndi í áðni, men tíverri er nakað av hesi uttanlandsskuld nakað, sum vit mugu gjalda aftur uttan, at vit hava fingið tilsvarandi nyttu burtur úr tí við okkara íløgum. Tíverri er tað soleiðis, at tað hava verið ymiskar feilíløgur í hesum, men tá henda skuldin og henda lántøkan hevur verið so stór, sum hon hevur verið tey seinastu árini, so hevur hon jú havt beinleiðis ávirkan á so nógv annað virksemi í landinum, tí lántøkan er primert farin til íløgur, farin til arbeiðsskapandi virksemi í síni byrjan.

Nú hevur tað verið ført ógvuliga nógv fram, at landskassin hevur jú ikki tikið tey nógvu og mongu lánini, tað eru privatir, sum hava gjørt tað. Nú kann man fáa eina uppgerð yvir, hvussu henda uttanlandsskuldin býtir seg sundur, men í sær sjálvum er tað samfelagsliga sæð líka mikið, hvussu henda uttanlandsskuldin býtir seg, tí pengarnir eru komnir inn í samfelagið, og teir cirkulera í samfelagnum sum heild.

Tá ið vit taka landskassans part í hesum her, so mugu vit fyrst tað fyrsta gera okkum greitt, at landskassin veðheldur fyri ein ikki so lítlan part av hesum. Vit mugu eisini gera okkum greitt, at landskassanum nær standandi fyritøkur, almennar fyritøkur og hálv almennar fyritøkur eiga eisini eisini ikki so lítlan part av hesum her, men tað er alt samalt farið til íløgur her í landinum.

Tá ið landskassin ikki hevur lænt pengar sjálvur, so stavar tað nevnliga frá, at henda lántøka og henda inntøka, sum annars er komin inn í samfelagið, hevur verið so rikilig, so ógvuslig hesi seinastu árini, at landskassin hevur bara sitið og tikið í móti yvirskotinum av hesum peningaríkidømi, sum er komið inn, tí hetta hevur skapt stóran eftirspurning eftir arbeiðskraft,

skapt nógv arbeiði. Alt okkara fólk hevur luttikið í hesum her, og tí er tað galið. Tað er beinleiðis galið, tá ið tað verður sagt, at tað er ikki tann vanligi verkamaðurin o.s.fr., sum eigur sín part av skyldini av hesum, øll eiga vit okkara skuld í hesum, tí at øll hava livað við í nýtsluni av hesum peningi, um man so persónliga hevur lænt hann ella ikki hevur lænt hann. Øll hava verið við til at fingið burtur av hesum, sum er komið inn í landið, og øll hava vit verið við harumframt at givið burtur av okkara part til landskassan og til kommunurnar í skatti og tolli. Landskassin hevur tí sjálvandi ikki havt fyri neyðini at læna peníng, tí hann kom inn av sær sjálvum burtur av tí, sum onnur læntu og burtur av tí, sum onnur hava framleitt, soleiðis er tað búskaparliga samanhangið í hesum og soleiðis fær hetta ávirkan á landskassan.

Landskassin hevði tí í 2 ella 3 ár stór yvirskot og heldur stórar uppsparingar, men tíverri fylgdu útreiðslurnar serliga í 1988 við hesum her inntøkunum, og tí gav 1988 ikki nakað yvirskot helst tvørtur í móti eitt hall, tá ið roknskapurin er endaliga uppgjørdur. Samstundis hevur landskassin verið úti fyri stórum veðhaldsútleggum, sum landskassin hevur noyddur at gjalda og tað verða eisini upp aftur fleiri veðhaldsútlegg í nærmastu framtíð, sum skulu gjaldast og tað snýr seg um nógvar mió. ja, tað snýr seg jú um hundraðtals mió. í hesum útleggum soleiðis, at landskassin nú eisini er í likviditetstrupulleikum. Hetta er sjálvandi alt saman fylgjan av, at tað hava verið nógvir pengar í sving og at nógvir av hesum pengum eru farnir meira ella minni eg vil ikki siga fyri skeyti, men eru meira ella minni mistir av ávísum feildispositiónum. Hetta mugu vit bara taka við og hetta mugu vít ásanna.

Tá ið vit tí eru í hesi støðu, so hevur hetta landsstýrið sjálvandi verið noytt til at sæð í eyguni, at soleiðis er støðan, og vit mugu tí gera nakað við hetta. Vit hava tí gjørt nøkur tiltøk.

Tey lógartiltøk, sum higartil eru gjørd, eru í tveimum pørtum. Annað er, at tollur er hækkaður nakað mitt í 1989 og at vørurnar tí verða nakað dýrari orsakað

av hesi toilhækking, og hesir pengar ganga so inn í landskassan. Harumframt er gjørd ein lóggáva um tvungna bundna uppsparing, sum fólk, ið vinna meira enn 110.000 kr., koma at taka lut í við einum minni procenti fyri tær lægru inntøkurnar undir 200.000 og 7 procentum fyri tað, sum liggur oman fyri 200.000. Henda tvungna uppsparingin verður uppkravd fyrstu ferð fyri skattaárið 1989. Av tí at skattárið var hálvrunnið, tá ið lógin varð samtykt, merkist hon nakað harðari hetta seinna hálva árið av 1989, enn hon kemur at merkjast framyvir, og sum øll vita, tað fyrsta árið verður henda samansparingin útgoldin á eina eftirlønarkonto í 1992, meðan tað framyvir verður beinleiðis flutt yvir á uppsparingarkonto hjá fólki frá 1990 og framyvir.

Hesi tiltøk hava havt sína ávirkan, tey merkjast. Tiltøkini við at niðurskera tær almennu íløgurnar frá 950 mió.kr. í 1988 til 550 í 1990 eru eisini tiltøk, sum merkjast. Tað, at vit hava sett ávísar avmarkingar í gildi fyri at taka lán uttanlands, er eisini nakað, ið merkist. Alt hetta merkist soleiðis, at samfelagið hevur ikki tann yviraktivitet, sum tað hevur havt tey seinnu árini, men hetta er nakað, sum vit meta vera heilt avgjørt neyðugt at gera fyri, at búskapurin í Føroyum aftur skal koma upp á rættkjøl. Tí vænta vit, at tá ið hesi tiltøkini nú veruliga eru komin at virka, og tá ið vit kunnu siga, at tann almenni aktiviteturin eisini við teimum sparingum, sum eru vístar á hesum fíggjarlógaruppskoti fyri 1990, kemur at virka, so verður meira peningur at flyta yvir í tann framleiðandi privata sektorin, so verður meira arbeiðskraft at flyta yvir í tann framleiðandi sektorin, og tað vil siga, at sjálv framleiðslan í samfelagnum kemur at verða størri og við ávísum vónum um hækkandi útflutningsprísir av ymiskum orsøkum, sum eg skal koma inn upp á í míni næstu røðu, sum eg tíverri ikki fái tíð til at koma við nú, tí tíðin er úti, so vil eg royna at ávísa, at hesi tiltøkini og tað, sum liggur fyri framman, at tað er ikki so sær ikki so myrkt út, sum menn vilja gera tað til.

Niels Pauli Danielsen (kffff) viðmerking

Harra formaður.

Tað er eitt viðmerking til háttvirda løgmann. Eg má satt at siga at eg dugi so illa at skilja løgmann, men tá ið hann var her uppi og talaði um, at tann nógv mest týdningarmikla fyri samfelagið hjá okkum er framleiðslainntøka, tað er útflutningsinntøka, so sjálvandi kunnu allir føroyingar taka undir við hesum, men tað tykir ikki vera so, tá ið hesar inntøkulógir vórðu gjørdar, tí tað rakar júst framleiðsluliðið.

Hjá lønmóttakarunum er tað soleiðis vorðið, at tað loysir seg so illa at arbeiða, tað loysir seg so illa at arbeiða yvirtíð, og tá ið tað yvirtíðararbeiðið minkar, so minkar eisini framleiðslan og útflutningsvøran. Hatta haldi eisini okkara háttvirdi løgmaður átti at duga at skilt, so at hann í grundini mótsigur sær sjálvum, tá ið hann so ágrýtin saman við síni samgongu gongur inn fyri at leggja inntøkulógir og økja um skattabyrðarnar og harvið gera tað truplari hjá teimum, sum starvast í framleiðsluútflutningsskapandi vinnuni.

Síðan harra formaður, vil eg fegin gera eina viðmerking til tað, sum formaður sambandsfloksins Pauli Ellefsen segði, har segði okkum, at hann hevði ongum samgongufundi verið á. Satt at siga teir hava lagt eitt fíggjarlógaruppskot fram, og teir hava ikki havt samgongufund um tað. So heitti hann á løgmann um nú at kalla saman til samgongufundar, so hann fekk høvi til at siga, hvat hann ynskti skuldi verða broytt í hesum her.

Eg má harra formaður siga, at eg skilji púrt einki av nøkrum.

<u>Tordur Niclasen</u> (kffff) viðmerking

Harra formaður.

Tað var ein viðmerking til landsstýrismannin í fíggjarmálum Ivan Johannesen.

Fyrst fari eg at takka honum fyri, at hann upplýsti fyri løgtinginum her, at landsstýrið arbeiðir við at finna ein veg at loysa teir fíggjartrupulleikar, sum altivinnan hevur. Meira vildi hann so ikki avdúka, men ið hvussu so er upplýsti hann, at arbeitt verður við hesum máli.

Annars fari eg at viðmerkja til Ivan Johannesen,

æraða landsstýrismann, at tá ið hann sigur, at politikkur kristiliga fólkaflokksins bara hevur til endamáls at økja um útreiðslurnar, so fer hann fullkomiliga skeivur. Hann hevur als ikki lurtað eftir eisini harra formaður, tá ið hann sigur, at eg havi sagt, at vit ikki skulu spara. Heldur ikki her hevur hann lurtað eftir. Tí eg havi bæði her í dag og eisini aðrastaðni alment sagt, at tað er neyðugt við sparingum. Vit eru bara ósamdir um, hvussu tað skal gerast.

Hvat inntøkum til landskassan viðvíkur, so eru vit ikki samdir við Sambandsflokkinum, og tað er teirra egna stevnuskrá heldur ikki. At byrðar verða lagdar oman á teir herðar, sum hava nóg mikið at bera frammanundan.

Vit høvdu eitt uppskot fyri at fáa pening til vega, sum m.a. gekk út upp á, at 50% skattamarkið varð varðveitt, at lág- og miðalinntøkurnar ikki komu undir skipanini, at lógin ikki fekk afturvirkandi kraft og at skattgjaldarin fekk henda pening aftur innan 2 ár við fullari rentu. So Ivan Johannesen fer púra skeivur her, tá ið hann sigur, at vit bara hava tosað um útreiðslur. Tað er neyðugt við inntøkum, men vit vilja ikki ganga við til, at leggja tungar byrðar á fólk við lág- og miðalinntøkum. Takk fyri.

Hergeir Nielsen (tf)

Harra formaður.

Tað er við stórum áhuga, at vit hava lurtað eftir framsøgumonnum flokkanna undir hesi viðgerðini higartil. Tað svitast ikki heldur ikki hesaferð, at teir, ið bera kannuna av fíggjarlógini og løgmansrøðuni, eru í verjustøðu, meðan hinir, ið ikki eru so hagfastir, sum heldur nýta teirra politiska lív til í einum taktiskum spæli um atkvøður, finnast at og siga sjálvar seg og sínum at hava kunnað borið so væl betri í bandi. Soleiðis sær myndin úr hvørja ferð, tá ið tær stóru viðgerðirnar skulu fara fram her, og hetta umfarið er so heldur einki undantak í so máta.

Tað, sum sermerkir støðuna, er so kortini tann politiski veruleikin, sum liggur í tí, at sitandi sam-

gonga er tann fyrsta av sínum slagi yvirhøvur, og verður tað tí í hesum sambandi meira roynt eftir spælarunum enn eftir bóltinum. Hesum mótleikarum fara vit at taka okkum av løttum og heldur royna at skoða verkið, sum liggur á borðinum, finna fyrimunir og lýti og vónandi fáa tey rættað soleiðis, at tey í síðsta enda verða til landsins besta.

Tað er einki at taka seg aftur í, at her eru rembingartíðir í føroyskum politikki. Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin hava ongantíð hálsfevnst, gera tað heldur ikki nú, men kunna kortini fylgjast á vegnum fram, tá ið nú aðrir ikki vildu taka við skipsboði og heldur løgdust heima at raka í øskuni. Tann eini leyp enn tá á bláman, tá ið sjálvstýrarin gekk fyri.

Vit hoyrdu andstøðumenninar her uppi í dag. Atli Dam brúkti teir fyrstu 5 minuttirnar upp á at filosofera um, at hetta stýrið hevði klandrast í 9-10 mánaðar, og at tað var bara hann, sum átti evnini til at hyggja afturum. Teir næstu 5 minuttirnar brúkti hann til at vísa á, at Javnaðarflokkurin hevði vunnið á sjálvstýrisleið tað, sum var vunnið higar til og hevði framt kollveltandi broytingar. Teir næstu 5 minuttirnar um tey ultrakonservativu stýrini fyri eystan og fyri vestan, sum rapaðu saman við javnaðarhugsjónini í Føroyum sjálvandi og teir næstu 5 minuttirnar vóru um hetta harmaljóðið um, at Javnaðarflokkurin manglaði nakrar tingmenn í seinast, hann sat í samgongu, hóast tað, at hann gleðiliga kundi rokna sær teir báðar sjálvstýrismenninar við.

Tað var ein tala í 20 min., sum ikki vísti á eina tað einastu eina konkreta loysn, hvussu vit skuldu koma frammeftir. Tað var bara briksl og tos og prát og sá tað út sum um, at hetta var eitt langtandi hugarensl klipt saman av 10 mánaðar gomlum leiðarum og dulnevndum lesarabrøvum í málgagni hansara.

Hinir báðir andstøðumenninir høvdu heldur einki at vísa á uttan Lasse Klein, har var eitt konkret uppskot, og tað var at avtaka eina skipan um bíðipening, sum Tórbjørn Poulsen í síni tíð sum landsstýrismaður í figgjarmálum. Hetta uppskot eru teir samdir við

kommunistarnar í Noregi um, eg kenni ikki nakrar aðrar, sum eru inni uppi á hesi skipan. Hetta var ein jarðarferðarsongur við lít og hann minnir mest um kvæðið hjá Poul F., hvar tað stendur: "Tá ein var fyrst í, var annar at enda, tann triði hann hevði í næsta vers fest".

Skuldi eg valt aftur í dag, hvørjum eg vildi fylgst við hesari samgonguni ella andstøðuni, so var eg ikki í iva um, hvørjum eg valdi at fylgjast við.

Tað er ikki tað heilt nógva, sum verður sagt um fiskivinnumál í løgmansrøðuni, men lat tað beinanvegin verða sagt, at tað eru tiltøk innan fyri hesa vinnu, sum vit leingjast allar mest eftir.

Ætlanin við at fáa stuðningin til fiskivinnuna á figgjarlógini niður á 0, sær lítið møgulig út nú, ið vit aftur siggja heilar 454 mió.kr. ella heilar 100 mió.kr. meira enn á seinastu figgjarlóg. Tað verður kravd ein frágreiðing um, hvussu hesin peningur skal nýtast, og eg vænti, at frágreiðingin kemur. Væl er tað rímiligt og neyðugt, at soleiðis, sum samfelagsskipanin er í dag við játtanunum yvir figgjarlógina til fiskivinnuna, er tað eins neyðugt at lúka burtur tey mest órentablu vinnuførini, sum bara tyngja um landsins búskap. Boðað varð frá nýggjum gongdum leiðum undir stuttu samgongu, og spurt verður eftir hesum undir eini nú vónandi longri samgongu.

Vónandi arbeiðir landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum miðvist við ætlanunum um at fáa burtur úr fiskivinnuskipanini tey før, sum kosta samfelagnum minni, tá ið tey liggja við bryggju enn, tá ið tey hava loyst frá landi.

At fáa meira fyri ta útfluttu fiskavøruna hevur verið ein standandi spurningur í fleiri ár. Nýggir møguleikar fara kanska at taka seg upp hesum viðvíkjandi við tí nýggju skipanini, ið vit fara at fáa við felagsmarknaðin, nú ein veldug marknaðarumskipan innan henda felagsskap fer at verða sett í verk inni á meginlandinum. Tann sokallaði innari marknaðurin hjá EF, har Danmørkin jú er limur, kemur at virka við ársskiftið. Okkum varð lovað tá í 1973, tá ið Danmark varð limur, at

vit einki ringt skuldu merkja av hesum limaskapi, hvørki so ella so, men, men mongum brestur atlan. Tað vælsignaða veto, sum m.a. Danmark skuldi eiga í hesum felagsskapi, er so mangan tráðkað undir føti, og missa limalondini, serliga tey smærru av teimum, meira og meira av teirra sjálvstýri.

Tað er eitt stórmál, hvussu føroysk áhugamál verða tryggjað og á besta hátt í komandi marknaðarumskipanini. Vit útflyta umleið 3/4 av útflutningi okkara til EF, og mett verður, at vit lata einar 40 mió.kr. í tollgjaldi til EF undir verandi skipan. Tað er serliga saltfiskur av øðrum enn toski, ófryst flak, fryst fars, royktar vørur, niðursjóðaðar vørur o.a., sum líður undir hesum tollgjaldi.

Føroyskur útflutningur til EF er so everska lítil í teirra verð. Har verða løgd upp á land meira enn 6 mió. tons av feskum og ísaðum fiski, og mett verður, at teimum tørva 1 mió. tons attur at til teirra egnu nýtslu. Hetta er so ein innflutningur í kr. upp á góðar 20 mia.kr., so at ein og hvør sær, at okkara útflutningur er bara ein viðáningur av hesum. Men kortini hava teir fingið ilt av, at Føroyum hevur verið ein lagalig tollskipan fyri m.a. 0 tolli við innflutningi til Danmarkar, og hetta verður ikki tolt longur. Danmark er í teirra og veruleikans eygum fyrst og fremst eitt EF land, og kemur so ríkisfelagsskapurin í aðru røð.

Í dagsins politikki, hvat ríkisfelagsskapi okkara viðvíkur, er tað soleiðis, at tað eru Delours og aðrir góðir menn inni á meginlandinum, sum gera av, hvussu hesi okkara higartil dags innanhýsis viðurskifti Føroya og Danmarkar í millum skulu síggja út framyvir.

Harra formaður. Nógv tey seinastu árini hava vit her í Føroyum nýtt fíggjarlógina sum eitt búskaparliga stýrandi amboð. Inntøkulógir, skattur og tollur eru trýst niður yvir høvdið á okkum føroyingum í alt ov ríkiligt mát, og tað hugsi eg, at tey flestu av okkum eru samd um.

Vit høvdu inntøkulógir í 1975, 1978, 1979, 1980, 1981, 1983, 1986 og so aftur nú í 1989.

Tað hava verið skiftandi landsstýri við luttøku av

øllum flokkum her á landi, sum hava hildið seg til hesa receptina. Tá ið fólka- og sambandsflokkarnir sótu uttanfyri, gartaðu teir áført um vinstravenda eyðrøning av Palleba, skattgjaldaranum ella tí vanliga løntakaranum, hvat ið vit so kalla hann. Peningurin lá best vardur í skattgjaldarans egna lumma og skuldi ómøguliga nýtast til at økja landskassans egna peningaumfar við. Roknað varð út pr. húsarhald, hvussu nógv hvørt húskið skuldi av við aftur at verandi skatti og avgjøldum, og sligið varð fast ferð eftir ferð, at nú var farið yvir um markið. Fólk orkaðu ikki meira, tey fluttu av landinum o.s.fr.

Nú situr Javnaðarflokkurin uttanfyri, og afturat tí, at hetta er álvarsamasta figgjarkreppa, ið okkara samfelag nakrantíð hevur verið úti fyri, so hevur Javnaðarflokkurin og málgagn hansara fyri so vitt kopierað tær í mangar mátar mannavondu útspillingar, sum serliga Fólkaflokkurin og fyri so vítt eisini Sambandsflokkurin stóðu fyri í andstøðuskeiðum teirra. Javnaðarflokkurin er fyri so vítt dottin í somu grøv, sum eitt nú Fólkaflokkurin lá í, gøvin, har trúvirðið er eitt fremmant hugtak. Eins og Fólkaflokkurin buldraði um vinstravendan ágang í móti tí meiniga manninum, so dundra ekkóini frá Javnaðarflokkinum í dag um høgravendan ágang. Har Fólkaflokkurin skrólaði harðast upp um tann best vardu peningin í skattgjaldarans lumma, filosoferar Javnaðarflokkurin í dag um, at tað psykologiska markið fyri skattatrýsti er nátt, og at tað tí er forkastiligt at fara víðari, hvør skal siga, Javnaðarflokkurin av øllum veit nágreiniliga, hvussu nógvar fjarðar, ið samfelagið kundi royta burtur av Palleba, áðrenn skinnið rivnaði.

Ongum var loyvt alt at vita, kunnu vit mutla innantanna, men opinberliga og alment sláa fast, at hetta eru hvølpalótir hjá hesum báðum flokkum. Prógvbyrðan er ikki tyngri enn so, at teir sjálvir koma knossandi við henni í inntøkulógarlíki, tá ið teir sjálvir sita í samgongu. Tvelr sera líkir flokkar, kunnu vit sláa fast, antin so annar situr í samgongu og hin í andstøðu, ella annar í andstøðu og hin í samgongu. Ella fyri so vítt, tá ið báðir sótu í samgongu seksáraskeiðið 1974-80, tá

skortaðu ikki inntøkulógir meira skatt og meira toll, nullstilling av prístalinum og annað gott, tá fingu vit inntøkulógina frá apríl 1975, inntøkulógina frá oktober 1978, inntøkulógina frá august 1979 og inntøkulógina frá februar 1980, og harafturat fingu vit nullstilling av prístalinum umframt lógina um at halda øll avgjøld til landskassean uttan fyri prístalsútrokningina eisini í 1980.

Harra formaður. Eitt tað mest umrødda málið fyri tíðina, er skattatrýstið. Hetta er, sum náttúrligt er, tí at skattaskrúvan enn einaferð hevur fingið eina snaring, hon er táttað enn einaferð. Hetta er ótolandi eisini hesuferð hóast tað, at skattur er neyðugur.

Skattatrýstið í Føroyum er hin vegin sammett við hini norðurlondini rættiliga lágt. Roknar tú tað í prosentum av teirri skattskyldugu inntøkuni, so var skattatrýstið í 1985 34,2%, í 1986 35,2% og í 1987 35,7%. Fyri at kunna samanbera við skattatrýstið í øðrum londum, so verða skattur og avgjøld løgd saman og roknað út í prosentum av bruttotjóðarinntøkuni. Noreg, Danmark og Svøríki hava tá eitt skattatrýst upp á ávikavist 48%, 52% og 56%, meðan Føroyar liggja niðri á 45%, tilskilast skal, at hetta eru tølini fyri 1987. Hetta eru øll framkomin lond, sum eins og vit hava økt um útreiðslurnar til teirra vælferðarsamfelag, men latið okkum so heldur ikki gloyma, at so búgva vit í einum vælferðarsamfelagi við góðum samferðslumøguleikum, undirvísingar- og heilsuverki og mongum, mongum øðrum samfelagságóðum og tíanverri tí stóra trupulleikanum, og tað er einum ov lítlum útflutningi, sum skal fíggja livifótin hjá okkum, og tað er honum, vit øll fara at berjast fyri hesi komandi 4 árini.

Tað eru nógv vandamál í hesum verki t.d. tað, at vit mugu ansa eftir, um vit t.d. skerja landsverkfrøðingsstovnin og tað bara hevur til endamáls at hækka talið hjá Almannastovuni, tað loysir ikki so ómetaliga nógvar búskaparligar spurningar.

Eitt heilt annað stórt vandamál er tað, at tað eru alsamt fleiri og fleiri føroyingar, sum fara til Danmarkar at búgva av skattaorsøkum.

Teir, sum t.d. sigla við grønlendskum skipum, rinda nøkur og 30% í skatti, sum verður tikin av teimum grønlandsku myndugleikunum. Síðani verður sama inntøka skattað her í Føroyum á vanligan hátt, og tá sær ein og hvør, at tá ið menn koma upp í 80% í skatti, tá fara teir at hugsa seg álvarsliga um fyri at koma burtur úr hesi knípu. Húskið flytir av landinum eitt nú til Danmarkar, har skipanin er tann, at einans nøkur og 30% verða latin í skatti alt eftir, hvør kommunan er og eingin skattur verður latin til Danmarkar.

Mær vitandi er ein avtala gjørd um at broyta hesa skipan og eftir tí, eg havi fingið uppspurt, so verður hon broytt frá 1. januar í komandi ári soleiðis, at føroyingar í Grønlandi reelt koma at skatta sum fastbúgvandi í Føroyum. Í mongum førum kann tað koma at verða soleiðis, at rentufrádrátturin, sum vit hava í Føroyum, kemur at gera tað, at maðurin fær minni skatt við at vera fastbúgvandi í Føroyum enn, at hann býr í Grønlandi serliga, tá talan er um ein familjumann, sum hevur hús og rentufrádrátt, sum sagt. Harafturat skal nevnast, at grønlendingar sjálvir eru við at hækka teirra skattaprosent kring landið fyri at loysa teirra trupulleikar, og tað er m.a. at halda føroyingum burtur.

Dagliga hoyra vit frá fólki, at tey verða trekt upp í fleiri og fleiri 70% í skatti av teirra inntøku. Hetta eru ikki bara søgur, hetta eru søgur, sum eru eftirkannaðar, og tær eru rættar.

Tær broytingar í skattalógini, sum vit gjørdu undir undanfarna landsstýri, høvdu ikki hetta siktið, og eg fari tí at loyva mær at spyrja landsstýrismannin í fíggjarmálum, um hann kundi givið mær eina frágreiðing um, hvussu tað ber til, at trekkið hjá so nógvum fólki liggur upp í og omanfyri 70%.

Tað er ikki fyri at mála støðuna serliga svarta, at eg nevni trupulleikar av hesum slagi, hetta eru trupulleikar, sum vit fara at vinna á og organtíð ov skjótt.

Eilif Samuelsen (sb)

Harra formaður.

Á ólavsøku helt løgmaður, sum siður er, sína løgmansrøðu.

Í røðuni samanfataði hann tey politisku tiltøkini, sum Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin feldu niður í samgonguskjalið, ið skal verða grundarlagið undir ti politikki, sum henda samgonga fer at føra hesi 4 komandi árini.

Politikkurin fer at verða nógv merktur av, at undanfarna landsstýrið í veruleikanum var ein ósambærilig samanrenning av flokkum, sum førdu ein fullkomiliga ábyrgdarleysan búskapar- og fíggjarpolitikk. Tann samgongan saknaði heilt og aldeilis eina stýrandi hond. Teir einstøku landsstýrismenninir sluppu at gera alt tað, teimum sjálvum lysti, uttan at teirra dispositiónir vórðu settar inn í eitt størri samfelagsligt perspektiv.

Hetta útnyttaðu helst teir smáu flokkarnir til sín egna fyrimun. Teir hava jú ongan veruligan politikk at føra, tí mugu teir gera vart við seg við at brúka pengar, og tað gjørdu teir í ólukkumát. Tað er ein royndur lutur í øllum londum, at smáir flokkar eru samfelagnum ein dýrur kleppur serliga, tá ið teir koma fram at stjórnarvaldi og onga stýrandi hond hava yvir sær. Atli Dam viðgekk eisini í sínum innleggi í morgun, at undanfarna samgonga gekk ov vítt viðvíkjandi útreiðslum, og har nevndi hann serliga almannaútreiðslurnar.

Fyri at rætta føroyska búskapin upp aftur hevur henda samgongan sett sær fyri at fremja nakrar álvarsamar atgerðir, sum fara at merkjast hjá hvørjum einasta húsarhaldi í landinum. Tey flestu hava longu kent sviðan av tiltøkunum, men hetta er tann neyðugi prísurin at galda fyri tann fullkomiliga ábyrgdarleysa fíggjar- og búskaparpolitikk, sum undanfarna samgonga við Javnaðarflokkinum á odda hevur ført hesi seinastu 4 árini.

Hóast útflutningsvirðið hevur staðið í stað seinastu 4 árini, so lat tann samgongan forbrúkið og harvið innflutningin vaksa ótálmað við tí avleiðing, at gjaldsjavnahallið var umleið 1 mia.kr. um árið, uttan landsskuldin vaks somuleiðis við 1 mia.kr. um árið. Ein

og hvør kann siga sær sjálvum, at tá ið vit føroyingar seinastu 4 árini hava brúkt eina heila milliard meira um árið, enn vit hava tjent, so má tað verða ein galin endi, og nakað má gerast við tað. Hetta áttu sjálvt sosialistar at gjørt sær greitt og viðgingið. Tað er hetta, ið er tann beinleiðis orsøkin til, at hesi skrøppu tiltøkini eru tvingandi neyðug.

Harafturat sluppu tær almennu útreiðslurnar at vaksa soleiðis, at løgtingsins fíggjarlóg undir seinasta landsstýri meira enn tvífaldaðist frá 1308 mió.kr. í 1984 til 2834 mió.kr. í 1988 ella ein hækking upp á 117%.

Nýggja samgongan ásannar, at fíggjarliga gongdin og støðan í samfelagnum krevur, at framd verða nógv ymisk og heilt serlig tiltøk, skal tað eydnast at venda búskaparligu gongdini rætta vegin, segði løgmaður í røðuni. Onkur av hesum heilt serligu tiltøkunum eru longu sett í verk.

Beint aftan á at samgongan varð skipað, játtaði tingið fiskivinnuni ein eykastuðul í hesum árinum upp á 180 mió.kr. Hetta var neyðugt av tí, at høvuðsvinnan av ymiskum orsøkum er vorðin útarmað hesi undanfarnu árini soleiðis, at eitt stórur partur av skipunum vóru um at koyra fíggjarliga føst og fiskivinnan sostatt við at steðga upp orsakað av ov stórari fallkomnari skuld, tí var neyðugt at hjálpa.

Tingið hevur eisini samtykt eina broyting í lógini um eykainnflutningsgjald, sum gevur landsstýrinum heimild at lætta fiskivinnuni um ymisk avgjøld, ið liggja á henni. Fyri at fáa pening til at hjálpa fiskivinnuni, hevur tingið eisini samtykt at hækka innflutningsgjøldini. Serliga innflutningsgjaldið, sum umfatar allar innfluttar vørur er hækkað við 5%. Harafturat eru avgjaldið á øli, rúsdrekka og tubbakki og bensini hækkað munandi. Hesar broytingar eru mettar at geva landskassanum eina meirinntøku upp á 76½ mió.kr.

Tann samgongan, sum sat nakrar mánaðar í vár, men sum kollsigldi seinastu dagarnar í mei, legði fyri tingið uppskot til eykaskatt á allar inntøkur yvir 200.000 kr. Hetta uppskotið fekk ikki undirtøku frá einum meiri-

luta í tinginum og fall saman við hinum uppskotum landsstýrisins.

Núsitandi landsstýrið hevur í tinginum fingið samtykt eitt uppskot um eykaskatt. Tað er ein 6% eykaskattur á feløg, men ikki persónar. Hesi feløg fara at gjalda umleið 10 mió.kr. í eykaskatti. Í staðin fyri at leggja ein eykaskatt á vanliga skattaborgaran, sum hann onganntíð sær aftur, so hevur henda samgongan framt eina lóg um bundna uppsparing, sum skattaborgarin fær útgoldna aftur 4 ár aftan á við rentum og rentum av rentum.

Hugsanin aftan fyri at velja henda framferðarháttin er, at tað er ein royndur lutur, at allar hækkanir í avgjøldum og skattum økja inntøkusíðuna á figgjarlógini. Økist inntøkusíðan, so økist útreiðslusíðan eisini tilsvarandi. Er tað nakað, vit ikki hava brúk fyri í hesum tíðum, so er tað ein hækkað figgjarlóg. Tvørtur í móti royndir henda samgongan av øllum alvi at minka um tær almennu útreiðslurnar so nógv, sum tað upp á nakran máta er gjørligt.

Vit hoyra og síggja øll í hesum døgum, at nógv halda, at skorið verður alt ov nógv niður, og at hetta fer at fáa óheppnar avleiðingar, men skulu vit hava nakra vón um, at fáa føroyska búskapin upp aftur á føtur, so má alt samfelagið innstilla seg upp á at skrúva blussið niður í nøkur ár. Vit mugu ásanna, at vit hava livað yvir evni og brúkt nógv meira, enn vit hava vunnið, tí teljast vit millum tey londini í heiminum, sum hava eina ta størstu uttanlandsskuldina pr. íbúgva. Hetta áttu vit at hildið okkum ov góð til, tí eingin, sum vit umgangast í umheiminum, kann hava virðing fyri einum fólki, sum ikki hevur so mikið tamarhald á sær sjálvum, at tað dugir at liva eftir tí einfaldu regluni at seta "tæring efter næring".

Føroya umdømi í umheiminum er so lítið í metum í hesum tíðum, at so gott sum allir seriøsir lánimøguleikar eru stongdir, meðan har aftur í móti alskyns fidusmakarar bjóða seg fram at læna hesum heimføðingum pening.

Høvuðsætlanin við tí bundnu uppsparingini er at tálma nýtsluni í samfelagnum. Hesi seinastu 4 árini hava

vit brúkt, t.v.s. keypt, etið, drukkið, ferðast og bygt fyri 1 mia.kr. árliga meira enn, vit hava vunnið. Vit hava við øðrum orðum havt ov nógvan pening um hendi og brúkt hann skeivt. Høvdu vit havt sett peningin inn, hevði tað virkað, at minni var at keypa fyri, minni innflutningur, minni handilsjavnahall, minni uttanlandsskuld. Peningastovnarnir høvdu havt meira pening at lænt út til vinnulívið, til húsabygging o.s.fr.

Tann økingin í keypiorkuni, vit hava havt seinastu árini, hevur ikki verið grundað á eina øking í framleiðsluvirðinum, tí tað hevur staðið nærum í stað seinastu 4 árini, men er har aftur í móti fíggjað við uttanlandslánum. At slíkt hevur sloppið at farið fram hesi seinastu árini, mugu føroya fólk hava loyvi at lasta okkara ráðandi politikarar fyri, tí teir áttu at havt sett tiltøk í verk, sum forðaðu slíkum. Henda nýggja samgongan hevur sett sær fyri at gera nakað við hesi viðureikifti, men fyri at røkka hesum máli, so krevjast sera strangar atgerðir, og tað eru tær, samgongan nú er farin undir at seta í verk.

Tað má sigast at vera ábyrgdarleyst út um alt mark, at Føroya Javnaðarflokkur í hesum døgum fyrst roynir at bagatellisera teir búskaparligu trupulleikarnar og síðani at øsa fakfeløgini upp í eini roynd at sabotera tey tiltøkini, sum hetta landsstýrið setir í verk fyri at koma burtur úr tí búskaparliga díki, ið fyrst og fremst Javnaðarflokkurin í ideologiskum galskapi hevur stýrt føroyska samfelagið út.

Í málgagni javnaðarfloksins verður júkað upp og upp í saman, at tað er ikki vanligi føroyingurin, sum hevur ábyrgdina av uttanlandsskuldini, men at tað er teir stóru og ríku, sum hava tikið hesi nógvu lánini, men sum ikki einaferð manipulera javnaðarmenn við meiningum njá fólkinum. Fyrst seta teir kílar í fóikið við at seta vanliga føroyingin upp í móti teimum múgvandi, undirforstaðið sjálvandi, at vanligi føroyingurin, tað eru tey, sum velja javnaðarflokkin, og tey, sum hava uttanlandsskuldina, tað eru tey, sum velja hinar flokkarnar. Handilsbygningar, vinnubygningar, flakavirkir, alistøðir, smoltstøðir, skip, sethús o.t. alt hetta er

lutvíst fíggjað við uttanlandslánum. Øll vit, sum búgva her á landi eisini javnaðarfólk, gera brúk av hesum fyritøkum, tí alt er fingið til vega fyri at tæna okkum 48.000, sum búgva í hesum landi, ongum undantiknum. Hvørja ferð ein vanligur føroyingur fer inn í ein handil at keypa okkurt, tær hann sær lut í uttanlandsskuldini. Hvørja ferð hann vinnur sær nakrar krónur við arbeiði umborð á einum skipi, arbeiðir á flakavirki, á eini alistøð, í eini forrætning, so fær hann lut í uttanlandsskuldini. Tað er einki ilt í tí tvørturimóti, men ta er amoralskt, ósolidariskt og undanstøkkiligt av leiðandi javnaðarmonnum at billa fólki inn, at vanligi føroyingurin onga ábyrgd hevur av uttanlandsskuldini.

Høvuðsuppgávan hjá hesum landsstýrinum má vera at halda fast um og at fremja tær atgerðir til at endurreisa føroyska búskapin, sum lutvíst eru niðurfeldar í samgongusáttmálan. Vit mugu sleppa burtur frá hesum kroniska undirskotinum á gjaldsjavnanum og venda tí til javnvág. Vit mugu økja um útflutningin og minka um innflutningin. Vit kunnu ikki tey komandi árini brúka so nógv av tí búskaparliga vøkstinum til hægri løn og útbygging av vælferðarstatinum, men vit eiga í staðin at styrkja og útbyggja framleiðslutólini og útflutningsvinnuna.

Fíggjarlógaruppskotið fyri 1990 er eitt gott prógv um, at hetta landsstýrið veruliga ætlar at gera nakað álvarsamt við hesi mál.

Hyggja vit at inntøkusíðuni á fíggjarlógaruppskotinum, so sæst, at skattir og toll- og framleiðslugjøld eru sett niður í mun til seinasta ár. Hetta er ein ásannan av, at tey tiltøkini, avgjaldshækkingarnar og tann bundna uppsparingin, ið sett eru í verk, fara at fáa tann ætlaða virkningin nevniliga at avmarka keypiorkuna, og ein fylgja av tí er, at tað fer at geva minni inntøkur í landskassan.

Ein avleiðing av tí minnu keypiorkuni kann fara at verða, at umsetningurin hjá handilsfyritøkunum verður minni, enn hann hevur verið. Tær mugu so royna at innstilla seg uppá, at hetta verður støðan tey komandi árini, og at tær mugu dempa sín aktivitet á summum økjum

og annars nýta síni skapandi evni og royna at finna nýggjar mátar at yvirliva uppá.

Ein onnur avleiðing verður kanska, at tollinntøkurnar og møguliga eisini skattainntøkurnar verða upp aftur minni, enn landsstýrið hevur mett. Um so verður, so mugu finnast enn fleiri sparingar.

Útreiðslusíðan á fíggjarlóginí er merkt av, at sparast skal mest møguligt í rakstrinum. Eingin ivi er um, at teir flestu stovnsleiðar saman við síni manning hava havt eitt tungt toyggj at draga, at fáa peningin at røkka til. Í fleiri undanfarin ár hava teir eisini fingið boð um at spara, so lítið hevur verið eftir hesaferð at spart á kontoini fyri reingerð, innbógv, blíantar og viskileður o.t. Nú hevur verið neyðugt og verður neyðugt at fara heilt inn á sjálvan bygnaðin á stovninum og tað er nakað, sum rakar hart, men eingin ivi er um, at tað letur seg gera, og at stovnarnir ikki nýtast at verða verri fyri sum frá líður.

Hvør einasti tingmaður kundi funnið nógv góð argument fyri at hækka nærum hvørja einastu konto á fíggjarlóginí,
men allir ábyrgdarfullir tingmenn vita í dag, at hesum er eingin møguleiki fyri í hesum tíðum. Tað kundi líkst onkrum at kravt stórar niðurskurðir á teimum sosialu útreiðslunum, soleiðis, at tað var latið yvir til fólk at klára seg sjálv, men her melda vit pass. Somuleiðis kundi onkur, fyri at tøknast veljarunum hugsa sær at kravt størri játtanir til almannamálini og til eitt nú sjúkrahúsverkið.

Fíggjarlógin skal samtykjast um hálvan desember. Til tað tíð fara vit í fíggjarnevndini at gjøgnumganga uppskotið nágreiniliga, bæði hvat ið inntøkum og útreiðslum viðvíkur. Endamálið verður, at hava eina avbalanseraða fíggjarlóg, sum veitir eina almenna tænastu á einum stigi, sum er í samsvar við tað samfelags inntjening, sum hetta landi er ført fyri at kasta av sær.

Niels Pauli Danielsen (kfff.) viðmerking.

Harra formaður.

Tað er bara ein lítil viðmerking til undanfarna røðara, háttvirda tinglim Eilif Samuelsen, sum segði at fíggjarlógin var meir enn trýfalda frá 1984 til 88, og nevndu hann tølini frá 1,3 til 2,8 tað er ein løgin trýfalding í minari verð, tað er tvífalding heldur, og so gloymdi hann at merkja tað við, at uppi'í hesum talinum er 600 mió. kr. er sett av heildarveiting. Blokkstudningurin er uppi í hesum her, tað gloymdi hann at fáa við, og so er tað jú eitt heilt annað bílæt, millum annað tað harra formaður, hava vit teir smáu flokkarnar at gera vart við, so teir stóru flokkarnir kunnu halda seg til sannleikan.

Elísar Arge (ff.)

Harra formaður

Sum tað nokk er gingið upp fyri formanninum so er tað fíggjarlógaruppskotið og løgmansrøðan á Ólavsøku, sum eru til umrøðu. Tá man nú hevur hugt eitt sindur uppá tað so má man hava eina góða og fasta trúgv uppá tað, at tað sum er gott fyri Føroyar, tað er eisini gott fyri meg og teg, tað mugu vit so ganga út frá.

Síðst í mai mánað tá var eg niðri í Jerusalem, tá lá eg og svav eina nátt har niðri, og so droymi ein sovorðan dreym, sum eg minnist so grúðiliga væl. Kann eg sleppa at siga frá honum? Hann hevur eina vissa relatión til tað sum vit hava til umrøðu her í dag.

Har droymi eg, at eg hevði fingið boð um at eg fekk sendandi ein kassa við síld, hann kom við einum skipi, tað var eitt dampskip og fólk vóru við at fara í land frá hesum skipinum. Eg trokaði meg álíkavæl upp í gjøgnum landgongdina, og sigi við hendan mannin sum stóð har við landgangin, at eg skuldi koma eftir einum kassa við síld, hann var klænir og skallutur, men eg kendi hann ikki, han var um 40 ára gamal. Hann svaraði mær at hann hjálpti mær í hvussu so er ikki við tið. Ná hví tað, tí tú noktaði at geva einum gomlum manni við kolbrandi í beinum nýggjar aðrar, og tað var honum so nógv ímóti at hann einki vildi hava við meg at gera, verð so góð. Eg svarari, hattar dugir tú ikki at meta

um, tað hevði ikki veri til nakra nyttu at geva hasum manninum nýggjar aðrar, men eg amputeraði beinið, og tað bleiv skjótt fríkst og nú gongur hann frískur og glaður við einari góðri protesu og hevur onga pínu. Tað er merkiligt man kann droyma sovorðið, ja hann ønti mær ikki aftur, men rætti bert hendurnar fram eftir tveimum, konufolkum sum stóðu aftan fyri meg, og so fór hann avstað við teimum eina undir hvørjum armi. Sinni í meg. Nesum vildi eg ikki finna meg í, eg vildi hava skiparin á tal, tað fekk eg eisini, hann var lágur á vøkstri og hann æt Højgaard til eftirnavn. Eg segði honum frá tilburðinum og hann helt eisini at hettar var ógvuliga nalsjønskt gjørt og hann skuldi royna at fáa greiði á ti. Tað gekk so ein løta og einki hendi, so eg aftur til skiparin, men tá var ein annar maður inni í kamarinum hjá honum og spurgdi hann hvat tað snúði seg um. Eg spurgði bara eftir hvar í skiparin var, so fekk eg at vita, at hann var í hinum borðinum, men eg mátti fara niður ígjøgnum ein leydara niður í maskinrumið og síðani tvørtur um maskinrúmið og so upp aftur í gjøgnum ein annan leydara fyri at koma
upp har yviri. Eg so gjørdi, eg fann eisini skiparin har og segði at nú mátti sildakassin koma fyri ein dag heilt skjótt. Ein løta gekk, tá kemur Sveri Olsen, sum er sum er yvirportørur á hospitalinum í hvítum jakka og kasjett dragandi við einum kassa sum stóð uppeftir enda, hann var byttur sundur í fýra rúm akkurat sum eitt kuffert hann kom dragandi við. Her er sildakassin sigur hann, og setti hann frá sær. Tá letur í einum óvita, tí eg spurgdi hvar sildin var, har var eingin sild í, hugdi tú ikki eftir sildini tá tú álikavæl var niðri í maskinrúminum. Tá rann tað knapliga upp fyri mær at eg varð hildin tann turra gjøldur. Tann kenslan, sum eg tá í dreymi kendi, hon er torfør at siga frá, men tað var ógvuliga ringt at kenna seg hildnan fyri gjøldur; tí eg kundi einki gera við tað og gjørdi álikavæl nakað við tað, so gjørdi bara ilt verri. Hattar var so dreymurin.

Nú skal eg takað eitt annað evni. Nógvir politikari halda at fólk gjalda skatt við gleði. Tað gjørdu tey kanska einaferð, tá tað var ein æra og ein

kærkomin skylda at geva Gudi tað sum Guds er og keisarinum tað sum keisarans, men hettar er neyvan so í dag. Um tit ikki vita tað, so kann eg siga tykkum frá, at tað er ein stór ónøgd og ein stór misnøgd millum manna, tí tey halda seg verða hildin fyri gjøldur, soleiðis er kenslan í fólki á dag, tíverri.

Vit hava í áravís verið óførir at skriva lógir av, útlendskar kanska serliga danskar og tær hava ikki altíð verði líka hóskandi fyri okkum, men við hvørt hava vit funnið gullkorn, sum t.d. 50% marki í skattinum og í okkara rentuskatting, men tíverri her sum aðrastaðni so finna menniskju og børn uppá so mangt undarligt. Alt ov nógv hol tykjast at verða til at smoykja seg ígjøgnum, og alt systemið verður tíverri missnýtt við avskrivingum og tílíkum, rentuspekulatiónum bæði við innlendskum og í dag kanska mest við útlendskum kapitali, men altíð er og verður hin henti skattabýttlingurin at standa við endan og merkja sviðan. Vit síggja alt meira og meira at býttur er hann ið betalir, sum bara rindar og slítur seg sjálvan upp fyri at forvinna pening og so sleppa at rinda meira og meira til eitt system er gjørt sjúkt av teimum sum kunnað, sum duga, sum tíma og sum ikki hava útviklað nóg gott samfelags sinni og tí spekulera í svørtum peningi, skattafidusum, stuðulsveitngum av ymiskum slag, sjálvboðnum likvidatiónum, í avskrivingum av tapum og missum og hvat veit eg. Men eitt veit eg og tað er hvørji ið rinda fyri gildið og tað eru vit sum gera, og verða helst vit hentu skattabýtlingar.

So leingi sum eg minnist hava tað fyri tað mesta verið krepputíðir, og lesur man søguna so eru tað krepputíð aftaná krepputíð og tær ljósu løturnar hava verið ógvuliga fáar, hvar tað ikki hevur verið kreppa. Eg kenni ikki til annanð enn at hesin góði skattamaðurin sum skal betala má spenna reimina inn. Eisini hevur tað fleiri ferðir verið ein vælnýttur væltaktikkur at siga fólki frá hvussu vánarligur økonomar ið undangongumennirnir vóru, og nú skal tað fáast skil á. Vit minnast hvussu útróðrarflotin og fiskiflotin, sum lá í andaleypi 1974 og eisini fleiri onnur vælár, tað kom hvørjari ferð fram. Vit minnast bananrepublikkina hjá

Atla. Vit minnast eisini hvussu Tórshavnar kommuna fleiri ferðir hevur verið á húsagangi, men hon hevur tó altið kunna svarað hvørjum sítt. Vit minnast eisini hvussu tað hevur verið roynt at fáa teir almennu endarnar, alsó pengarnar til røkka. Vit minnast tá Erlendur t.d. var fíggjarmálaráðharri og vit fingu ein mánaða eykaskatt tá. Vit minnast eisini hvussu Purkhús kom við oljugaldinum og nú hava vit funnið uppá eina tvungna uppsparing. Tað er helst rætt at: "Riget fattes penge", og eg veit tað er gjørt eitt stórt, og eg haldi eisini eitt vala arbeiði, sum er gjørt fyri at finna út av hvussu vit fíggjarliga og búðskaparliga standa her í landinum, og fyri at finna út av, hvat er til ráa at taka fyri at rætta uppá hesi skeivu viðurskiftir. Men ikki hevði eg væntað at Fólkaflokkurin fór at bróta 50% markið í skattinum. Sjálvt um tað verður rópt tvungin uppsparing, og tað er sagt fleiri ferðir í dag at tað er tvungin uppsparing, sum vit fáa aftur einaferð, men á mínari skattablanket stendur tað sum skattur. Tað er øktur skattur og eg hevði heldur ikki væntað, at vit fóru at seta tollgjaldið upp, og eg hevði heldur ikki væntað

vit fóru at seta tollgjaldið upp. Og eg hevði heldur ikki væntað at vit fóru at verða við til at gera lógir við afturvirkandi kraft. So kunnu vit siga, at tað eru ikki lógir við afturvirkandi kraft, tí vit eru í sama skattaárið. Men tá ið helvtin av hesum árinum var farin, tá hevði eg goldið ein skatt, og so næstu mánaðarnir, so betalti eg aftur meira skatt, og nú fyri triðju ferð, er tað skatturin, sum er settur upp. Um vit vilja hava fólk at trúgva, at hetta ikki er skattur, so mugu vit geva teimum betri og greiðari boð um, og seta tað upp uppá ein rættan hátt. Nú kunnu vit siga, at tað er kanska tekniskt ógjørligt, kanska dýrari at seta tað ordentliga upp, men eg haldi vit skylda fólki tað, at vit klárt og týðiliga søgdu hvat var tvungin uppsparing og hvat er skattur. Í dag er tað blandað saman og eg skilji fólk væl, at tey ikki skilja hetta her. Eisini tað boðið, sum vit fingu frá Líkningarráðnum í Føroyum, hvar vit knappliga fingu eina uppgerð. Hvat var tann uppgerðin um,

eingin skilti hana, og eg trúgvi ikki, at nakar skilir tað enn. Um vit ikki kunnu fáa greiðari boð, vit vanligu skattaborgarar, sum skulu gjalda hetta gildið allikavæl, fáa greiðari boð um, hvat ið tað er, so er tað ikki rætt.

Eina lítla ábreiðslu haldi eg eisini at eg fari at føra fram her, eg veit ikki um tað er ábreiðsla, men tað undrar meg. Tað var, at vit sleptu ti Kristiliga Fólkaflokkinum uppá fjall, tá ið á stóð, tað kann gott verða, tað er nei, men hann er uttanfyri, men hann var okkum hollur, nakrar mánaðar framanundan. Tað pindi meg eitt sindur.

Og so er tað tann síðsta avgerðin hjá landsstýrinum við hesum skúlastjóranum suðuri í Vági. Tað er landsstýrið sum skuldi taka hasa avgerðina, tað er púra rætt, men tað undrar meg, at man gerð ein slíkan útskurð, tá ið tann kanningin, ið varð gjørd, segði faktiskt nakað annað, og skuldi nakar verða, sum man segði, avrættaður, tað er so nógv avgjørt, ella hava sín straff, so vildi eg mett, at teir lærarar, sum vóru stungnir av úr skúlanum, burdi verið koyrdir, fyrst og fremst og so kanska allir samlir, fyri at fáa frið. Men bara at koyra
skúlastjóran, mær dámdi tað ikki, men soleiðis gjørdi landsstýrið av, og so má man vóna, at tað er rætt av-gjørt.

Út frá øllum hesum her, so eisini snakkað um trúð-verdigheit, og eg vil siga sum soleiðis, at eg haldi ikki fólk hevur so lítla grund til at ivast í okkara trúðverdigheit í løtuni, men vónandi kunnu vit rætta skútuna upp eisini á hesum økinum, sum eg eisini vóni, at vit fáa rætta skútuna upp á tí buskaparliga og øko-nomiska økinum.

Eitt annað evni. Higartil hevur endamálið við skattapolitikkinum verið, fyri tað fyrsta, at útvega pening til raksturin av tí almenna, og fyri tað næsta at fremja eitt meiri rættvist býti av inntøkunum, og fyri tað triðja at bera so í bandi, at tær breiðastu herðar-nir, bera tær tyngstu byrðarnar. Tað restar bara í hesum her, at definera, hvørjir teir breiðastu herðarnir eru.

Og tí er tað serliga tað petti í endamáalinum í skatta-politikkinum, henda samviðskutølandi hugsanin, sum eg ætli at siga eitt sindur um. Tær breiðastu herðarnir, skulu bera tær tyngstu byrðarnar. Hatta er ein pen hugsan, tað er bara tað keðiliga við tí, at í fleiri ár hava tær breiðastu herðarnir ikki borðið tær tyngstu byrðarnar. Og hetta halda øll seg vita, við góðari grund, vildi eg sagt, tá tey siggja hvussu leikur ferð fram. Hvørjir eru so teir, ella hesin hervilligi jokarin, sum oyðileggur spælið. Er hann nevndur, so er hann kendur, so eg haldi, at eg nevni hann bara beinanvegin: Tað er tann skattskylduga inntøkan. Tað tykist at vera aðrir borgarar í Føroyum, enn hesir her henti skat-tabýtlingarnir, og hesir borgarar, teir tykjast, sum eg segði í áðni, at duga, teir kunna, og teir hava samviðsku til at tilpassa sína skattskyldigu inntøku, til tað sum teir halda er rímiligt fyri teir at gjalda í skatti. Men hesir snildi skattaborgarar og medborgarar, teir sýnast at liva í eini fíggjarligari tvístøðu, dupulttilverða. Tann eina tilverðan sigur frá teirra sjálvuppgivnu skattaskyldigu inntøku, og hin tilverðan, sum sigur frá, hvussu teirra veruligi livihátt er, og ber ein týðuligan vitnissburð, at her er ikki rætt, sum tað átti at verði. Hatta er kanska hørð orð, men eg trúgi tað er
soleiðis. Og eg havi eisini skrivað um at atkvøða fyri uppskotur um at bøta eitt sindur um hetta her, soleiðis at tað ikki verður teir sum betala skatt frammanundan bara skulu betala meira og framvegis at verða roknaður, sum næstan at verða býtlingar. Til dømis var tað eitt uppskot um at almannakungerða hvat hvør einstakur skat-taborgari veruliga rindaði í skatti, men tað fekk ikki frama. Men tað kundi verði gjørt nógv lógartiltøk, fyri at fáa eitt rimiligt býti av skattanyrðuni, og sjálvt um vit nýtti nakrar miliónir til at fáa skil á hesum óskilinum, so vórðu tær givnar væl út. Er so einki lýti at finna, so ongantíð betri, men tað eigur ikki bert at viðgerðast út frá reint juridiskum núgaldandi lógum, har mugu eisini moralskar lógir til, fyri at fáa part í hesu nýhugsan.

Nú skal eg gevast fyri hesaferð, men eg havi meira.

Törbjørn Poulsen (sj).

Harri Formaður!

Líta vit nøkur valskeið aftur um bak, so verða vit varðug við, at tá nýggj samgonga er skipað eftir val, verður gjørt nógv burtur úr, at avmynda støðuna í samfelagnum, so vánaliga, sum nú einaferð til ber. Vinnulívið er í skeljasori, búskaparliga støðan hættisleg, uttanlandsskuldin met stór, ja vit kenna niðurlagið. Hesin atburður, ella taktikkur, tænir tveimum endamálum. Í fyrsta lagi, at seta undafarnu samgongu í eitt vánaligt ljós, í teirri vón at hava nakað at reypa av, tá fýra ár eru farin. Í øðrum lagi, fyri at rættvísgera ti neyðuga í, at leggja upp aftur størri byrðar á skattgjaldaran, sum undanfarna samgonga sjálvandi má bera alla skuldina fyri. Hetta gjørdi Pauli Ellefsen í 1981, vit minnast tosið um vinnunan, sum var koyrd føst, tað stóru uttanlandsskuldina, sum tá var, og teir ikki bert tómu, men nógv yvirtrektur almennu grunnarnar. Atli Dam gjørdi tað sama í 1985, tá metti hann land okkara ájavnt við bananrepublikkina, sum Essa nevndi, og tað sigur jú ikki so lítið. Hetta tosið um neyð og vesaldóm, kann bert hava skaðað okkara umdømi í útheiminum, og gjørt okkara møguleikar annars verri enn neyðugt varð.

Núverandi løgmaður nýtti somu framferð sum undanfarnu starvsbrøður hansara hava gjørt, men hann var eitt sindur meiri varin, tó ikki meir enn so at hann roynir at rættvísgera tann verunleika, at núsitandi samgonga hevur sæð seg noydda, til at útskriva eina eykarokning til hin føroyska skattgjaldarin uppá 200 mió. kr. eftir einum hálvum ári, og hettar er met í so máta. Sjálvandi er tað undanfarna samgonga, sum eigur alla skuldina fyri tí neyðuga í hesum tiltaki.

Aftaná at fyrra samgongan, hin sonevnda sjálvstýrissamgongan varð skipað í januar í ár, og fíggjarløgtingslógin fyri 1989 avgreidd kom róp í. Fiskivinnuni tørvaði 180 mió. kr. afturat í studningi

fyri bert at klára seg so dont. Var hettar mál komið undir viðgerðini av fíggjarløgtingslógini var einki til hindurs fyri at stórur partur av hesi upphædd kundi verið fingin til vega við sparingum og út yvir tað sum spart varð.

Ein meiriluti í samgonguni kravdi, at tørvandi upphæddin til fiskivinnuna øll sum var skuldi takast inn frá skattgjaldarinum við nógv hækkaðum tollgjørdum, og eykaskatti ella tvungnari uppsparing. Sjálvstýrisflokkurin segði nei, vit vildu vera við til at veita fiskivinnuni tað hon hevði fyri neyðini, men vit meintu at tað mátti kunnað finnast aðrir møguleikar enn at fara tvørtur um stikið har tað er lækst, nevniliga niður í lumman á lønmóttakrinum.

Vit høvdu heint samtykt eina fíggjarløgtingslóg, har stórar peningaupphæddir kundu verið spardar um vilji var til tess, hygg bert hvussu mikið núsitandi samgonga hevur fingið burturúr. Vit vístu á óskattaðan pening í hesum samfelag, vit vístu á grunnar, vit vístu á bíðipening løgtings - og landsstýrismanna og stuðulin til politisk upplýsing o. s. fr., men alt til fánýtis. Ein meiriluti í samgonguni kravdi at skattur og avgjøld skuldu takast inn við harðari hond, so var einki at gerðahjá sjálvsstýrisflokkinum enn at taka seg burtur úr samgonguni, vit vildi ikki sita fyri slíkari framferð.

Núsitandi samgonga tók við har undanfarna sleptið, um enn bonskari varð farið fram, og nú skuldu sjálvt lágirntøkurnar ikki sleppa undan.

Tað hevur fleiri ferðir verið víst á her í tinginum hvussu hættisligt tað er fyri rættarstøðuna í einum samfelag at lóg verður sett í verk, sum hevur ávirkan á tíðina áðrenn lógin varð borgarinum kunnug, lat meg bert her vísa á, tær átfinningar sum viðmerkingar, sum táverandi anstøðuflokkur, fólkaflokkurin við Jógvani Sundsteini og sambandsflokkurin við Agnari Nielsen, sum umboð flokkana í skattanevndini bóru fram, í álitinum til uppskot til broytingar av avskrivingarlógini á vári 1985. Tá varð talan um at seta eina lóg í gildi frá tí degi hon varð framløgd her í tinginum og ikki sum átti at verið aftaná hon varð lýst.

Lógin um tvungna uppsparing er ein lóg av sama slag, hendan lóg er lýst í Kunngerðablaðnum sum er komið út 7. juli í ár, tað vil siga at hon fær gildi frá 8 juli í ár, sum er dagurin eftir at hon er lýst. Men tann inntøkan sum skattaborgarin hevði fyrra hálvár hevur ávirkan á tað upphædd, um hann verður kravdur í tvungnari uppsparing seinna hálvár. Av tí at árið er hálvrunnið, tá lógin kom í gildi, verður skattaborgarin kravdur nærri tí tvífalda av tí, sum talvan í lóginni vísir, soleiðis er okkara kumulativa skattaskipan einaferð hátteð. Hettar er ikki í lagi, men við til mága støði undan rættarsamfelagnum.

Vit í sjálvstýrisflokkinum fara at loyva okkum at venda aftur til hettar mál her í tinginum, og skal Essa Arge fáa loyvi til at taka undir við okkum í hasum spurninginum.

Tað er væl skiljandi at fakfeløgini mótmæla. Neyvan høvdu tey gjørt vart við seg um lógin prístalsviðgerð av lønum stóð einsamøll. Vit vita, at eitt nú danir eru komnir longur enn vit í so máta, og við góðum úrsliti, men omaná inntøkulógina fyrr í ár, man ætlan samgongurnar kennast fakfeløgunum óboðin. Tað er ikki fakfeløgini sum eru skuld í teirri støðu vit eru komin okkum út í búðskaparliga. Tað er ikki lønmóttakrin sum er orsøkin til okkara veldugu uttanlandaskuld. Kortini hava vit higartil bert hoyrt talan um at tað er hann, sum skal halda fyri.

Løgmaður sigur í Ólavsøkurøðu síni, at vit øll fara at kenna farran av teimum ábótum ið gerast skulu.

Tað ein kann lesa sær til í samgonguskjalinum hjá hesu samgonguni, og tað sum higartil er sett í verk, týðir ikki uppá at so verður.

Hvat við at kanna eftir hvat tey feløg, sum eiga stóra partina av uttanlandsskuldini leggja eftir seg av skatti her á landi. Sambært nýliga kunngørdari frágreiðing frá Líkningarráð Føroya, varð samlagið felagsskatturin 1987, 121 mió kr, harav rinda peningagstovnarnir minni helvtina ella 45%, tað er 54 mió. kr. eftir til øll hini 1600 feløgini eru sostatt 57 mió kr. ella í meðal 35.000 kr. í part, tað er alt harra formaður.

Hvussu ber tað til at hesi feløg lata so lutfalsliga lítið til landskúsarhaldið í skatti. Kann tað verða tí at reglurnar fyri avseting í grunnar er lagaligari hjá okkum enn aðra staðni. Er tað tí at reglurnar fyri skattligum avskrivingum eru rúmari her hjá okkum enn í grannalondum okkara.

Kanning sum líkiningarráðið hevur gjørt vísur, at um rentuinntøkurnar frá innlstandani í føroyskum peningastovnum høvdu verið mótroknaðar í rentuútreiðslunum, hevði rentufrádrátturin hjá feløgunum í 1987 verið lækkaður 95 mió . kr. Varð hettar gjørt, hevði meir skatturin hjá feløgunum ligið um eini 50 mió. kr.. Hvat við teimum ágóðum sum menn hava úr hesum feløgunum, akfar, telefon o.s.fr., jú harra formaður. Almikið er at taka av, áðrenn lagt verður eftir lønmóttakarinum um bert vilji var til staðar. Men eg má viðganga at tað sum samgongan hevur gjørt er mikið meira ómakaleyst enn at fara í holt við tað sum eg júst havi nevnt.

Tann parturin av okkara uttanlandsskuld sum stavar frá teim fýra donsku realkreditstovninum er oman fyri 2 milliardir kr. Hesin peningur man fyri størsta partin vera settur í handils- og skrivstovubygningar, sum fyrsta upp til 10 árini kunna avskriva í minsta lagi 4% av útveganini av virðinum. Soleiðis verða hesir bygningar spardir fyri stóra skattaupphæddir. Hvat við at lækka avskrivaða prosenti, hvat var meiri natúrligt enn at tann parturin av okkara vinnu, sum stendur fyri so
stórum parti av okkara uttandsskuld eisini sleppur at bera ein part av teimum byrðum nú tøkini skulu takast.

Vit í sjávlstýrisflokkinum fara at venda aftur til hendan spurning í næstum.

Okkum í sjálvstýrisflokkinum hevur verið kastað fyri, at vit hava verið ímóti inntøkulóginum, men vit hava einki sett í staðin til tess at útvega landskassanum pening. Hettar er ikki beint.

Eg havi júst víst á eina rað av møguleikum, sum átti at veri troyttir og kundi hildið fram. Vit vita at fleiri og fleiri skattgjaldarar hava funnið út av teim skattligu fyrimunirnum sum okkara serliga rentuskatta-

skipan ber í sær. Sambært Líkningaráðið er vøksturin í rentufrádráttinum frá 1984 til 1987 vaksin við 75% ella meira enn tað tvífalda av hvat tann skattskylduga inntøkan er vaksin. Hettar er millum annað orsakað av at ávisir spekulantar gør sær dælt av rentuskattaskipanini og vinna sær stóra inntøkur á hendan hátt. Her er nakað fíggjarligt at fara í holt við, og tað gleðir meg at hoyra at landsstýrið og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum Ivan Johannesen boðar frá at landsstýrið er farið at kannað málið.

Tað hevur verður ført fram í almenna orðaskiftinum, eisini av væl at sær komnum folki, at fíggjarlógin bert í lítlan mun kann nýtast sum stýrisamboð av virkseminum í landinum. Hettar eri eg ikki samdur í. Í okkara samfelag har tað almenna gongur aftur í nærum øllum virkseni, har landskassin við partapeningi láni, veðhaldi og øðrum tílíkum hevur knýtt seg mest sumn at øllum fyristakseni, hevur fíggjarlógin al stóran týdning, bæði beinleiðis og óbeinleiðis. Í vesturheiminum finnur tú valla samfelag har tað almenna og privata er so samantvinnað, sum hjá okkum.

Tá 300 mió. kr. meira ella minni tilvildarliga verða tiknar burtur úr fíggjarlógini frá einum ári til annað, samstundis sum skattgjaldarin verður álagdur aðrar 200 mió. kr. í tvungnari uppsparing, tað er eykaskattur og avgjøld, so er tað greitt at hettar fær álvarsama ávirkan á alt samfelagið, avleiðingin verður tvífaldað.

Tá ferðin skal takst av einum akfari, er tað av stórum týdningi, at hjólini ikki blokera, tá bremsað verður, Størri ferðin er størri er vandin fyri at tú missir tamarhaldi á akfarinum um tú uttan fyrilit høggur bremsurnar í. Akfarið fer runt ella út av breytíni, hettar vita øll sum hava staðið koyriroynd.

Tað sum nú hendir er at samgongan, verður uppskotið til fíggjarløgtingslóg fyri 1990 samtykt, blokkerar samfelagshjólini ístaðin fyri at hon við skynsemi átti at tálma umferðini. Hettar kann koma at hava álvarssamar avleiðingar, sum tað verður seinur dagur vit fáa rættaðuppaftur.

Úrslitið av tí politikki hendan samgongan hevur lagt upp til er, at frægasta fólki rýnir av landinum og tað sum eftir verður missir áræði.

Tann útreiðslu greinin á fíggjarløgtingsuppskotinum, sum uttan samanbering hevur fingið nógv størsta niðurskurðin er § 15, vísind bókmentir og list ein niðurskurð uppá 26 mió. kr. svarandi til 21% harra formaður. Satt at siga so hevði eg ikki væntað annað.

Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu stendur undir skúla- og mentamál okkurt at lesa um ætlan samgongurnar við skúlaverkinum, men um mentamál finst einki, ikki ein einasti stavur.

Samgonguskjalið er sum ein einvísir floksformaður her á tingi plagdi at taka til: "Kemiskt reinsað fyri eitt hvørt útsagn um menturnarligar spurningar". Úrslitið siggja vit í fyriliggjandi fyrsta uppskoti til fíggjarløgtingslóg hjá sitandi samgongu. Tað er gingið út yvir søvnini , tónleik, sjónleik o. s. frv. , men mest er tað gingið út yvir Fróskaparsetur Føroya við einum niðurskurði uppá 15% í mun til í ár.

Vit høvdu vænta hesa herferð frá sambandsflokkinum og fólkaflokkinum, men vit høvdu ikki væntað at tjóveldisflokkurin við landsstýrismanninum í mentamálum á odda, legði navn til hesa køvandi hondina á menturnarliga virksemi. Meðan vit eru við menturnarmálini fari eg at loyva mær nevna upphæddina ið sett er av til Norðurlandahúsið. Upphæddin er hin sama sum tann í sett er á fíggjarlógina í ár, men nú er tað so, at landsstýrið eins og ministararáðið hevur góðtikið rakstrarætlanina fyri húsið 1990, og so nytttar tað ikki at seta eina og aðra og minni upphædd enn tann ið tilsøgn er givin um. Eg rokni við hettar er ein misskilling, og at skeivleikin verður rættaður í fíggjarnevndini.

Játtanin til Leikpall Føroya er skorin niður frá 2 mió. kr. í ár til 1,8 mió. kr. í næsta ár, tað var ikki annað at vænta frá hesi samgongu, men hvat verri er, nú vit eru farin um hálvan september eru einans 500.000 kr. útgoldnar Leikpalli Føroya afv játtanini fyri í ár ella 1/4 av tí játtanini teir hava krav uppá. Hettar drál setur tey ið arbeiða innan leiklyst og sum hava mikið

virksemi at svara fyri í eina sera ringa støðu, hettar er átaluvert uttan mun til um tað er landsstýrið ella fíggjarnevndin, sum liggur í buktini harra formaður. Eg vænti hettar málið verður avgreitt í landsstýrinum ongantíð av skjótt. Takk fyri harra formaður, eg komi aftur til nakrar spurningar sum verða reistir í samband við biðipeningar og nógv annað seinni.

Jákup Lindenskov (jv.)

Harra formaður.

Hetta er so fyrsta umrøðan síðan vit fingu annað landsstýri í hesum valskeiði, umrøðan av løgmansrøðuni á Ólavsøku og fíggjarløgtingslógini. Tað er vanligt at frágreiðingar geva okkum eina vegleiðing um tað ,sum ætlanin er at fremja, vit fáa nakað at vit um framtíðarvónir, um hugskot um tað sum setast skal út í kortið til tess at gera hetta landi fjálgari og líviligari soleiðis kenni eg í hvussu so er løgmansrøðurnar árini frammanundan.

Hjá okkum sum skulu lóggeva er ikki bert hettar her at skula hyggja at hvussu alt fer fram, men meira at leggja út við tankum og hugskotum sum kunnu laga upp undir eitt betri samfelag, tað er í hvussu er tann málsetningurin vit í javnaðarflokkinum hava.

Tað kann verða at umstøður kunnu tala ímóti at tað verða framtøk á summum økjum, men all oftast og altíð so má tað verða soleiðis at vit vænta framtøk á flestum økjum. Víst hava vit haft eitt vána summar, væta og sólleyst, men harfyrí falla vit ikki í fátt, tí tað hevur hent fyrr, og heldur ikki geva vit landsstýrinum skuldina fyri tað vána summari soleiðis sum tjóðveldismenn á sinni, tá í tað vignaðist so illa í Grønlandi við ísi og lítlari veiðu, men í tíðum tá tungt er at fáa alt at bera til, tá er í hvussu hettar her at lata standa til, tað ringsta sum kann henda, tí tað er tá krevst um nakrantíð at vit brynja okkum til aat vinna á foringunum og byrja okkum til at takað tøk av nýggjum.

Eftir orðalagnum í løgmanumrøðuni so haldi eg ikki

heinleiðis at vit kunna siga at hetta er ætlanin. Tað er ilt at skilja hvørjum tað skal tæna bara hettar at minka um á øllum økjum, krevja av løntakarinum samstundist, sum er tann sum minkingin rakar uppaftur at skula gjalda meira afturat.

Vit siggja á fíggjarlógini, at tað verður minkað t.d. um studning til íløgugrunnar, og í tíðarskeiðum tá arbeiðsloysi er fryktandi, ja beinleiðis er ein hóttan, er tað neyvan klókt at minka um íløgugrunnar til framleiðsluskapandi virki, heldur er at stuðla um tíðlík tiltøk sum eru útflutningsfremjandi, og so minka um innflutningin.

Á pappírinum er uppskotið til fíggjarlógina 1990 lægri enn tann lóg vit liva undir í løtuni, men sum tað skilst so er hettar gjørt á ein heldur sjálsaman hátt fyri ikki at síga løgnan, tí her er skorið av á øllum økinum næstan yvir ein kamb. Her sær ikki út sum um serligt umhugsni liggur aftanfyri uttan hettar at skula skera burturav.

Hoyra vit so teir menn í hvussu er meginpartin av teimum, sum verja hettar uppskot tí vit hava líkasum hoyrt at tað eru nokk ikki allir, sum eru teir sum eru minni enn so glaðir fyri uppskotið sum er lagt á ting, og tað undrar fyri so vítt okkum.

So er skjótt at merkja sær, at tað er lítið, fyri ikki at siga einki samsvar við tað sum flestu teirra tosaðu um í heyst og tað teir siga nú, tí her er veruligt umskift við lít.

Allar tær inntøkulógir, sum Fólkaflokkurin og sambandi søgdu verða so púra óneyðugar og skilaleysar, hesar sum vóru gjørdar fyri einum ári síðani, tá vit mettu tað verða neyðugt fyri tálma peningabrúkið, tað vóru tær um oljugjald og ferðaseðlaavgjald o.s.fr.. Tær skuldu verða avtiknar við brestum komu hesir til valdið, og hvat er tað sum vit siggja í dag, ja hvat er virðið í teimum orðum sum hesir menn pynta seg við, so kunnu teir tosa um aðrar um at verða, um at manupulera um at verða demagogiskir um framsetan av veruleikanum av politikkinum í dag, hvørjir eru meira manípulerandi enn nettupp hesir, sum mynda sambandsflokkin og fólkaflokkin

í dag.

Øll tey uppskotini um avtøku og annað, ið duttu sum kavaflykrur á tingborð, ja fyri einum lítlum ári síðani. Hettar siggja vit í dag var einki annað enn lærtar fjarðrar, tað var tað bera blendverk, tí teir meintu einki við tað, teir meina einki við sín politikk kunna vit siga. Vit hoyra heldur ikki eitt kis um hetta frihalgaða 50% skattamark fólkafloksins, eingi um hvussu manminkandi tað var at seta í verk lógir við afturvirkandi. Tí nú er tað hent at fólkaflokkurin og sambandið og tjóðveldið seta í verk lógir afturvirkandi, vit kunnu siga leggja skatt oman á skatt, langt omanfyri 50% av inntøkum hjá vanligum fólki, samstundis sum vit eisini hava hoyrt í dag, stórar inntøkur framvegis nærnast eru skattafrælsar her í landinum.

So hava vit eisini her í dag hoyrt menn siga, tað er skeivt og sjálvsagt tað er javnaðarflokkurin, tað er væl eingin annar, sum sigur nakað her í samfelagnum sum boðar skeivt frá, og sum leggur tekstin skeivt út, tí tað er ikki skattur uppsparing, vel lat okkum so siga tað er uppsparing, men hvussu var fyri einum ári síðani, hvussu stóðu hesir somu menn ikki her á pallinum og greiddi frá at tað var skattur, tað var ikki pensión tá vit tosaðu um hina samhaldsføstu, tá var tað skattur, tá var tað ikki pensión, men nú er tað sum vit kalla fyri skatt, nú er tað pensión knappliga, ja skilji tann ið skilja kann.

Mangt er broytt uppá stutta tíð. Vit kunnu bara lesa Dimmalætting, sum hálovar tjóðveldisflokkinum í aðru hvørju reglu, og ikki bara tað, men sjálvsagt teir gera tá, teir gera tað á donskum, tí tað eru jú gæve mænd í den nationale parti, sum tað stóð einaferð herfyri. Med forståelse for dagens politiske virkelighed, jú vit kunnu siga tað er gott tá ið tað rennur saman, men hvussu gott tað er fyri hettar samfelagið fyri framtíðina, tað fáa vit so at siggja.

Skulu tær broytingar fara fram, sum vit hava fingið boð um frá løgmanni á Ólavsøku, so halda vit tað verður eitt veldugt afturstig fyri ein stóran parti av fólkinum. Eg hugsi um økið her í Suðurstreym, vit hava

ein hóp av timaløntum fólki, vit hava nógv fólk íð almennum arbeiði, sum eru almert lønt, og tað sum stendur fyri durum duga vit at skilja, tað er tað, at tað skal verða ein veldugur niðurskurður yvir alt eisini í talinum á fólki sum er í almennari tænastu, men eg biði samgonguna allíkavæl hugsa um, tit sum hava so serliga nógv ímóti øllum, sum eru í almennum størvum, tí tað kenna vit frá summum av málgøgnum tykkara. Minnist til at hetta almenna virksemi, tað er tað sum hevur stýðjað so veldugt upp undir at vit veruliga hava tað góða samfelag, sum vit eiga her hjá okkum, tað eru tær almennu fyritøkurnar, sum eru stuðulin, sum eru meginstuðulin undir at vit kunnu hava eitt samvirkandi gott samfelag, soleiðis at eisini tey privatu virkini kunna virka og virka væl, gloymi nú ikki tað.

Sjálvsagt er altíð neyðugt at spara og ansa eftir at tað sum verður búkt, at tað verður rætt brúkt. Hetta hava vit yvirhøvur einki ímóti og vit vilja sjálsagt altíð verða við har tað er rætt, har tað er rímuligt og tá tað er talan um vit skulu spara.

Eg kundi hugsa mær at nevnt eitt mál sum ofta var frammi fyrr , men sum vit hoyra so ómetaliga lítið um, og sum vit slett ikki hava hoyrt um nú í vit nú hava haft hesa sokallaðu gulltíð í Føroyum, vit kunnu siga við yvirproduktión, yvirinnflutningi av peningí sum teir rópa tað.

Nú haldi eg tað var Atli Dam sum nevndi í sínari røðu, at tað sum okkum tørvaði, tað er stýringsamboðini, vit hoyrdu Paula Ellefsen tosa nokk so nógv um hesa skuldina, hesa uttanlandsskuldina vit hava, ja vit kunnu kalla uttanlandsskuld, uttanríkisskuld er tað í hvussu so er ikki, hendan samlaða skuldin. Tað sum hann serliga vil vísa á tað er tað, at hettar er hent meðan javnaðarflokkurin hevur sitið við leiðsluni í hesum samfelag, ja javnaðarflokkurin hevur jú sitið í leiðsluni tað mesta hesum nógvu ártíggjunum hesum síðsti. Tað sum vit áhaldandi og íhaldandi hava vist á, tað er tað at vit mugu hava tey røttu stýringsamboðini og har vil eg nevna landsbankan sum nú aftur skal verða skerdur til nakað heilt óbrúkuligt, tað er harmiligt. Høvdu vit haft

stýringsamboðið so høvdu vit ikki haft hesa støðuna sum vit hava í dag, men tað hava teir flokkar sum nú breggja sær av at skula bjarga landinum, í hvussu so er sambandsflokkurin og fólkaflokkurin, teir hava ikki vilja hatt tað at vit hava eitt alment amboð, sum kann taka sær av peningastýringini í hesum samfelagnum, tað er tað sum meginorsøkin til støðuna sum hon er.

Tað hava verið nógvan viðmerkingar, tað hevur sjálvsagt verið lagt meðinpartin eftir javnaðarflokkinum, tí støðan skal verða vorðin so vánalig, ja onkur nevndi hettar, at henda samgonga hevur arvað kaos í landskassanum. Eg veit ikki hvaðani hattar kaos skal skiljast, tí teir sum eru grannskoðarar har, teir sita ídag sum ovastir leiðarar og andsvarshavandi av landskassanum eisini. So um tað er har í kaosið er, tað veit eg ikki, men tað var einki kaos í landskassanum, tá ið javnaðarflokkurin fór frá í tinganesið. Tað var tað ikki, men tað vóru vekslar sum skuldu gjaldast, eg kundi eisini nevnt frá kaosinum frá stýrinum frammanundan, men tað skal eg lata verða við at nevna.

Nú síggi eg ikki so nógvar landsstýrismenn, men onkur kundi borið boðini. Eg vildi sett ein fyrispurning fram um, hvat vit koma at frætta um Føroyingahavnina, sum er eitt mál sum altíð hevur haft ógvuliga stóran áhuga fyri føroyingar og hevur stóran áhuga fyri føroyingar framvegis, hvat hendur í hesum málinum, er tað soleiðis at hettar máli er bara avreitt og punktum á sama hátt sum Skála skipasmiðja og annað, og einki meiri skal henda, eg spyrji??

Harra formaður.

Vit skulu viðgerða fíggjarlógaruppskoti nú, tað fer í nevnd, og eg fari at vísa á javnaðarflokkurin, sum altíð fer at viðgerða eisini hettar mál sakliga og nágreiniliga. Vit fara at vísa á at tað er neyðugt, at vit ikki skerja tað sum stendur undir almannamálum soleiðis at hetta førir til eina avskeplan av okkara sosialu lóggávu, sum er ein týðandi táttur, ikki bara fyri velferðina men í heila tikið fyri virkseminum í hesum samfelagnum. Vit fara eisini at minna á, at heilsuverkið um

tað verður skorið óvnógv í tí, so kemur hetta eisini at raka samfelagið sera álvarsamt. Vit mugu fara varisliga um her.

Vit skulu eisini minnast til at ein partur av tí sum vit tosa um at spara her, tað er partvist goldið av statinum, og nú haldi eg at tað hava ikki veri færri enn tveir røðarar úr sambandsflokkinum, sum hava vist hetta velduga við tað at figgjarlógin sjálvsagt undir javnaðarleiðslu var vaksin tvifalt, og vel den hvør skal siga, har eru menn sum duga at brúka, annað duga teir ikki til. So aftur til hettar her at manopulera við orðum, at manupolera við frásøgnum her í tinginum. Vit skulu minnast til at statsstudningurin , blokkstudningurin hann er farin inn í hesa figgjarlóg, sum skal verða hækkað tvifalt, hví ikki siga sannleikan sum er, hví altíð balla orðini inn í iva sum ting sum gera sum ein av røðarinum segði, at trúðverdinheitin hon kann ofta verða ivasom, tá íð menn halda tilikt fram her í tinginum.

Jógvan við Keldu (ff.)

Harra formaður

Tað er løgmansrøðan og figgjarløgtingslógin fyri 1990 ið verða viðgjørdar undir einum. Hetta er heilt natúrligt, tí tær fella í tráð hvør við aðra. Tær hava til felags at tær lutvist hyggja báðar aftureftir, men tað ið kemur at hava týdning fyri samfelagið hvør kósin í nú verður sett.

Ofta verður tikið til at koma til búgvið borð, tað kann núverðandi samgonga ikki siga at hon er komin til.

Samgongan seinastu fýra árini við javnaðarflokkinum i fremstu røð lat eitt illa stjølað samfelag frá sær, sum á so at siga øllum økjum var í álvarsligari kreppu.

Við einum handilsjavna halli tey seinasty fýra árini uppá slakar 3,3 mia. kr. ella yvir 800.000mió. kr. árliga, einum gjaldsjavnahalli seinastu árini uppá 1,9 mia. kr., uppá smáar 500.000 mió. kr. árliga og eini uttanlandsskuld uppá 6,7 mia. kr., sum teir sjálvur

hildu verða kanska 2 mia. kr. lægri.

At henda samgonga ikki kom við frægari úrsliti er fyri so vítt ongum at takka fyri uttan teimum sjálvum. Javnaðarflokkurin umsat tvey høvuðsmál, nevniliga fiskivinnuna og íðnaðin. Meðan fyrrverrandi løgmaður røkti fiskivinnuna við siðuna av løgmansstarvinum hvørdu vit ein annan landsstýrismann sum umsat íðnaðin, nevniliga Vilhelm Johannesen. Eg haldi tað er nokk so løgið at hesir menn tora at verða so ræstmæltir sum teir eru.

Fiskiflotin koyrdi allur sum hann var við stórum halli, sjálvt langfara fiskifloti okkara íð beinleis hevur givið pening til samfelagið fyrr uttan afturberingar gav stórt hall, heimafiskiflotin liggur undir sera høgum trýsti og ekur á knøðunum.

Flakavirkini góvu 80 mió. í hall seinasta ár. Einki av teimum hevði yvirskot, og harumframt gav alingin 40 mió. í halli og tað sær ikki mætari út framyvir um ikki nakað álvarligt verður gjørt. Heimaíðnaðurin hevur nú ikki givið nakað nevnuverðugt av sær. Hvat sigur so landsstýrismaðurin í íðnaðarmálum tey seinastu fýra árini, jú her er eingin kreppa í hesum landi. Nú var tingmaðurin Jákup Lindenskov her uppi og segði, at tað var almennu skrivsovunar og fyritøkurnar, sum hildi landinum uppi.

Bæði núverandi samgonga og føroyingurin annars eigur at leggja sær í geyma, at tað ið føroyska samfelagið nú hevur brúk fyri er eini landsstýrissamgongu, sum er meiri vinnulívsvinarlig, ein samgonga sum veruliga ferð undir skeringar av bæði almennumíløguvirksemi og almennum rakstrarútreiðslum. Ein samgonga ið envnar at aftur at fáa skil á okkara yvirbygda almenna og í mongum førum óvirkna skrivstovuveldi, ið avgjørt ikki fremur góða stýring í hesum samfelagi.

Vit skulu eisini gera okkum greitt at tað er núsitandi landsstýrissamgonga við fólkaflokkinum á odda í fremstu røð, ið hevur fulla ábyrgd av hvussu hettar samfelagið sær út, sum fráliður Fólkaflokkurin bæð føroyska fólki um, at lata okkum sleppa fram at, hetta eydnaðist. Tí er tað sum verða man

greitt, at vit taka høvuðsábyrgdina av, at stjórna hesum landi og herða ábyrgd er ómetaliga álvarsom í slíkum tíðum sum vit nú eru í. Taka vit fíggjarlógina, so er tað helst fyrstu ferð at fíggjarlógin eftir heimsbardagan er lækkað samett við árið fyri, men sjálvandi tað ið kemur at verða avgerandi sum onkur hevur verið inni á fyrr her í dag, hvussu hon komandi árið verður stýrd, og at vit ikki finna somu yvirtrekk ið verið hava seinastu árini. Roknskapurin fyri 1988 er enn ikki uppgjørdur, so hann liggur kanska einar 200 mió.kr. hægri enn man hevði roknað við. Skerjingar ið nú verða gjørdar, áttu at verið byrjaðar fyri mongum árum síðan. Hyggja við at skattatrýstinum í 1980'unum, siggja vit, at meðan landsskattatrýstið er økt munandi, hava kommunurnar eitt nú sum Tórshavnar og Klaksvíkar kommuna lækkað skattatrýstið. Hagtølini hjá Føroya líkningarráð vísa, at bara í 1985 og til 1987 øktist skattatrýstið úr 34,2 upp í 35,7%. Hetta kemur fyri ein stóran part eisini av, at meðan ársinntøkurnar eru øktar, er progresivi skattaskalin sum landsskatturin er roknaður úr eftir ikki broyttur. Kommunurnar fáa í dag, bert 25% av tí ið landskassin fær inn, nevnliga meðan kommunurnar í 1987 fingu 546 mió.kr. fekk landskassin 2,1 mia.kr. Í samband við eina broyting í kommunulógini, kemur heilt náttúrliga at verða hugt at lutfallinum fíggjarliga, millum land og kommunur, so umframt at støða landskassans er vánalig, so er hon fyri so vítt nógv verri enn tað verður víst á í fíggjarlógini. Eg fái ikki tíð at koma inn á tað her.

Taka vit so fíggjarlógina og gera nakrar viðmerkingar til tey tøl sum eru sett upp, siggja vit, at av teimum stívu trímum mia.kr. er tað almannakontoin, ið fer avstað við 800 mió.kr. ella meir enn 25%. Fleiri av hesum upphæddum eru lógarfestar og kunnu tí ikki verða broyttar uttan broyting í lógini. Hesar broytingar eru ógvuliga neyðugar og at gera skjótt. Í samgonguskjalinum verður sagt, við formansins loyvi, at útreiðslumynstrið á almannaøkinum verður gjøgnumgingið við tí fyri eyga, at tryggja, at tey sum veruliga treingja, framhaldandi fáa

tað tey hava fyri neyðini. Hinvegin, er tað nakað sum ikki bara ørkymlar meg, men sum eg fari at biðja fíggjarnevndina nyggja eftir. Tað er sjálvur almanna stovnurin ella skrivstovan er økt úr 15,7 mió.kr. og upp til 17 mió.kr. í 1990. Eg haldi, at hetta gongur ikki. Vit mugu ikki hugsa, at hon fest betur at virka fyri tað um vit fylla meiv fólk inn. Spurningurin má meir snúgva seg um, at fáa stovnin effektiviseraðan og um leiðslan ikki kann greiða tað, so at seta onkran ið evnar hetta. So eg fari at biðja landsstýrið seta luppin á henda stovnin, tí hann virkar langt frá væl, og sum nú eisini er komið fram hesa seinni tíðina at nú man fer at økja og víðka skrivstovuøkið fyri at kunna fylla meir fólk inn. Hetta má tykjast hvørjum føroyingi ómetaliga løgið. Næststørsta upphæddin er fiskivinnan, hana fari eg at biða við og koma aftur við. Tað er ein konto sum hevur fingið munandi niðurskurð og tað er kontoin heilsumál. Eg kann ikki siga, annað enn, at eg eri eitt sindur ræddur fyri, at hesin niðurskurður er gjørdur við tí fyri eyga, at man meir ella minnið fær niðurlagt tey smærru sjúkrahúsini, fyri síðan aftur tá ið betri tíðir eru, at kunna geva landssjúkrahúsinum eitt veruligt skump uppeftir. Tað hevur altíð verið lættari hjá landssjúkrahúsinum, at fingið pening til tað teir hava vilja. Hetta fari eg at hava eyguni eftir. Skerjingin er 46 mió.kr. av 400 mió.kr. og hóast største skerjingin er á landssjúkrahúsinum, er skerjingin lutfallsliga nakað eins, men tað kemur at merkjast nógv harðast hjá teimum smærru sjúkrahúsunum, tí tey á hvørjum ári verða hildin niðri á cinum støði, so tey fyri so vítt liggja í andaleypi. Eg fari at gera vart við her, at meðan umsitingin av almannaverkinum stendur undir landsfyrisitingarkontoini, so er umsitingin av heilsumálum á kontoini yvir sjúkrahúsverkið. Tað vil siga, at meðan heilsumál sum var 400 mió.kr. er skerd við 46 mió.kr. niður í 354 mió.kr. er almannamál sum eru upp á 800 mió.kr. uppi á sama støði. Hetta verður nakað sum fíggjarnevndin má taka upp og hyggja nærri eftir.

So er tað grein 14, sum eitur skúlamál. Skúlakontoin er framvegis á nógv hægri støði, enn hon var í

1988, hóast henda konto lækkaði við stívum 29 mió.kr. úr 1989-1990 so er langt eftir á mál. Úr 1989-1990 hækkaði hon við smáum 78 mió.kr., so her er langt eftir á mál. Mær fyrikemur, at landsstýrið ikki torir at nerta so nógv við stovnarnar sum liggja tætt upp at teimum, ti tað sær út til, at hesir eru ikki so nógv skerdir ella yvir høvur skerdir. Hyggja við at landsskúlafyristingini ella skrivstovuni sum umsitur skúlarnar liggur hon á alt ov høgum støði, hon fór úr 12 mió.kr. í 1988 til stívar 15 mió.kr. í 1989 og nú fyri sovitt á sama støði. Eg trúgvi, at landsskúlafyrisitingin er eisini ein stovnur sum er yvirmannaður og skal effektiviserast og hetta kann eg viðgera seinni. Tað at hann er yvirmannaður ger, at fólk har á stovninum finna sær okkurt at gera sum er meir ella minni óneyðugt uttan nakað gevandi endamál og er við til at virka fyri at seinka øðrum úti um landi. Vit mugu gera okkum greitt, at stovnar sum ikki virka so sum almannastovan oglandsskúlafyrisitingin mugu takast upp í landsstýrinum til umrøðu, og verður tað síðan neyðugt at skifta fólk ella leiðarar út, ja so má tað gerast, tí slíkir stovnar kunnu verða meir til skaða enn til gagn og tað at fylla fleiri fólk inn ger støðuna nógv verri og er til stóran ampa fyri samfelagið.

Vit síggja tað sama á samferðslukontoini sum vit síggja aðra staðir. Landsverkfrøðingsskrivstovan sjálv, ella stovnurin verður havdur á sama støði ella verður øktur meðan skerjingin fer fram úti um landi. Eftir ti eg dugi at siggja so hava lønir á høvuðsstovninum verið tiknar av arbeiðnum runt um í landinum, tað stendur í viðmerkingunum. Meðan arbeiðini eru skerd úti um landi við góðum 78 mió.kr. í 1988 og vi 45 mió.kr. í 1989 er stovnurin so gott sum óbroyttur. Tað sum ræður um, við øllum skrivstovuveldinum er, at skerja kvadratmeturtali og fáa sent nakað av fólki heim, ti vit mugu nú gera upp við okkum sjálvi, at samfelagið hevur ikki ráð til henda yvirbygning og samgongan stendur við fullari ábyrgd av hesum.

Eg lovaði at at venda aftur til kontoina á grein 16, sum er fiskivinna, siglihg o.t. Orsøkin til, at vit nú standa við eini upphædd til høvuðsvinnu okkara upp á

555 mió.kr. hevur nógvar orsøkir. Vit mugu siggja í eygunum, at fiskatilfeingið ikki er tað sum tað hevur verið og hóast tað, hava vit gjørt íløgur í skip. Gjørdu vit ikki íløgur í skip, so sótu vit eftir við einum flota sum ikki samsvarar tíðarinnar krøvum. Skal henda uppbødd lækka komandi árini, eru nakrar treytir m.a. sum samfelagið má lúka. Fyri tað fyrsta mugu munandi skerjingar gerast beinavegin á okkara yvirbygda skrivstovuveldi og hóast henda yvirbygning, so virkar hetta ikki nóg væl hjá okkum. Í aðru syftu, umframt at vit fáa fisk frá egnum skipum verður neyðugt at keypa fiskavørur frá øðrum londum til tilvirkingar her, og í triðja lagi skulu vit fara at tilvirka úr triðja landi, so mugu vit fyrst geva okkara fólki ein skattlætta, so síðan lækka kostnaðarleguna á øllum økjum, við ti framleiðslukostnaði. 4. Vit mugu við hesum og øðrum nýhugsanum flyta fólk úr tænastustovnunum og yvir á framleiðsluna. 5. Vit mugu avtaka stovnar og ráð sum vit av figgjarligum orsøkum ikki orka at hava, teir eru ikki so fáir, og vit kunnu ikki hava stovnar og ráð sum øll londini uttan um okkum hava, vit hava størri trupulleikar at berjast við enn teir, eisini tí, at vit eru so mikið fjarðstaddir. 6. Tá ið fruktirnar av hesum vísa seg verður neyðugt at skilja vinnuna burtur frá tí almenna og lata tey aftan á, at vit hava givið teimum grundarlagið standa sun geva og tað ið ikki ber uppi má fella. Men áðrenn talan er um hetta má vinna okkara fáa livilikindi, bæði betri skattamøguleikar og eitt lægri kostnaðarlag. Nú er tíðin hjá mær við at fara undan, men tað var eitt annað sum eg kundi hugsa mær at tikið í og tað er tað sum Hergeir Nielsen var inni á í áðni eisini viðvikjandi sjómonnum sum sigla í Grønlandi, so eru teir undir munandi verri umstøðum í Føroyum enn um teir búðu í Danmark. Danmark sum hevur eitt nógv hægri skattatrýti enn vit, so landsstýrið má broyta hesa lóg í hesi tingsetu, soleiðis, at vit ikki fáa eina flukt av góðum fólki.

Uppskotið til figgjarlóg 1990 fer nú í figgjarnevndina og vónandi finnir hon fleiri skerjingar. Ger hon ikki tað, so er sjálvsagt, at tað fara at koma onnur

krøv frá ymsum økjum í landinum m.a. úr Norðoyggjum. Vit koma nú yvir fyri okkara landsmonnum at vísa um vit veruliga meina við tey lyfti vit hava givið. Takk fyri.

Henrik Old (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Byrjanin hjá Jógvan við Keldu, hon týddi ikki nógv upp á, at hann er í samgongu, men tað er møguligt, at tað fer at ganga upp fyri honum ein dag, at hann er uppi í eini samgongu við tað, at byrjanin var eitt skot fyri bógvin á einum parti, ið hvørfall, av samgongumonnum, men eisini hjá okkum øðrum, sum vóru við í samgonguni við tað, at hann nevnir hetta illa skjølaða samfelagi sum vit lótu frá okkum. M.a. kemur hann inn upp á, at langfaraflotin gav eitt stórt hall, hann má hava fylgt illa við tí sum er fyrigingið í Klaksvík tey árini ið vit sótu í samgongu, hvar tann langfaraflotin hevði so góðar dagar sum hann ongantíð hevur havt fyrr, burtursæð frá, at línubátarnir komu í eina knýpu, tá ið teir ikki fingu loyvi at fiska, men tað vónandi klárar Jógvan við Keldu í ár, sum eg skilji á lagnum. Men tá ið hann kemur inn upp á, at nevna hetta yvirbygda skrivstovuveldið, so haldi eg, at Jógvan við Keldu er farin rættiliga langt, ti at fyrí fyrsti ferð hevur man leigað so grefligar bygningar sum man ongantíð hevur hoyrt um í Føroyum fyrr, so Jógvan við Keldu er víð at leiga til hetta yvirbygda skrivstovuveldi við tað, at man er farin út á Argir, at leiga ein bygning sum eingi hevur sæð nakað til fyrr. Hetta er nakað sum fyrigongur meðan Jógvan við Keldu situr í samgongu og tað kundi týtt upp á, at hann ikki hevur funnið útav at hann var í samgongu.

Heini O. Heinesen (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var líka ein viðmerking og helt at eg skuldi taka hana beinavegin, tí tá ið undanfarni røðari sigur tað, at støða landskassans er so og so váttaliga, og so nevnir hann tað, at Tórshavnar kommuna og Klaksvíkar

kommuna hava lækka skattatrýstið tey seinastu árini. Hann nevnir ikki tað, at teir hava økt munandi um skuldina hjá hesum báðum kommununum og eg haldi, at hann skuldi fingið sær yvirlitið yvir búskapin hjá kommununum tað haldi eg er nokk so umráðandi un hann hevði fingið sær tað, so kundi hann sæð hvussu hesar báðar kommunurnar eru stýrdar, tí landskassin hevur organtíð havt tað so gott sum í undanfarnu samgongu, tað kann Jógvan við Keldu fáa prógv fyri um hann leggur í at lesa tølini rætt, so hevur landskassin konsoliderað seg munandi í undanfarnu samgongu. Eg haldi, at hann kundi tikið ein hálvan tíma við Jóngerð Purkhús, so kundi hon vist honum hvat hetta snúði seg um. Eg skal bara nevna eitt dømi. Avlopið hjá landskassanum fyri 1987 var yvir 300 mió.kr. 250 mió.kr. vóru settar í grunnin til effektivar veðhaldbindingar, tað var bara fyri at fáa hasi tingini upp á plass. So koma upp her, og siga tað, at hesar báðar kommunurnar hava konsoliderað seg, teir hava havt møguleikar fyri tí, tí vit vita tað, at skattaskipanin bleiv broytt í 1984. Tað er tað sum eg haldi er rættiliga alvorligt har man tosar um búskapin í samfelagnum, so eru tað kommunurnar sum ganga á odda í hesum óskilinum.

Jógvan við Keldu (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var fyrst Henrik Old sum tosaði um, at eg hevði nevnt, at fiskiflotin gav stort hall. Hetta var ein konstatering sum eg gjørdi og langfaraflotin bæði frá Barentshavinum og Flemish Cap hevði hall í fjør og eisini, at vit vita, at Flemish Cap hevur verið stongdur í 2 ár. Hatta var bara ein konstatering sum eg gjørdi, fyri at vísa hvussu torførum viðurskiftum vit livdu í. Viðvikjandi tí at eg hevði nevnt um skrivstovuveldi. Nú veit eg ikki um Henrik Old lesur mínar greinar, tær eru kanska so mikið nógvar, at hann hevur ikki tí til tað, men eg havi mótmælt yvir fyri landsstýrinum og yvir fyri mínum egnu tað sum er hent í samband við at man fer at leiga ein bygning úti á Argjum til at økja skrivstovu-

veldi, tað havi eg gjørt.

So tosar Heini O. Heinesen um skuld og um skattin, tað er sjálvfylgiligt í eini kommunu sum tað er framburður í, har er tað heilt náttúrligt, at man økir, hvar tað er útbygging, at man økir um eina lánibyrðu, men eg kann siga Heina O. Heineser, at lánibyrðan er eisini lækka, sammett við inntøkurnar og tað er tað sum hevur ein týdning í hasum. Vit hava havt ein óalmindiliga stóran framburð har, men tað er rætt at vit hava lækkað skattaprosenti. So nevnir hann, at eg hevði kunna fingið ein ½ tima við Jóngerð Purkhús, tað hevði kanska ikki verið so gali, men eg haldi, at tað skal Heini O. Heinesen ikki kunngera uppi á løgtingsstólinum.

Vilhelm Johannesen (jv.)

Harra formaður.

Tey seinastu 10 árini er nógv tosað og skrivað um uttanlandsskuld, tað var serliga Sambandsflokkurin og serliga formaðurin í Sambandsflokkinum sum legði fyri við hesum tosi og hesi skriving upp undir vali í 1980. Tá var uttanlandsskuldin hjá Føroyum, also netto uttanlandsskuldin kropin upp á eina slaka mia. kr. og Sambandsflokkurin segði, at nú mátti vend koma í, nú mátti Sambandsflokkurin sleppa at stýra Føroyum tey næstu 4 árini, tí nú skuldi afturberingin av hesi uttanlandsskuldini fara fram. Úrslitið var so, at vit fingu eitt borgarligt landsstýrið eina borgarliga samgongu, tey 4 árini frá 1980-1984, men tá ið tey 4 árini vóru farin so kundu vit bara konstatera, at uttanlandsskuldin var økt uppaftur meir, hon var farin úr 1 mia.kr. upp í 3 mia.kr. Seinastu 4 árini hevði Javnaðarflokkurin leiðsluna í landsstýrinum og tað vísir seg nú, at talið fyri okkara uttanlandsskuld er rættiliga stórt, tað er uppi á 6,7 mia.kr. og fólk kring landið hava fingið tað fatan, at tað eru Atli Dam og Vilhelm Johannesen sum hava reist út í longd, tikið 100 tals mió.kr. í lánum til landskassan og borið hesar 100 tals mió.kr. heim til Føroyar og tí er støðan soleiðis sum hon er. Men hetta er ikki rætt. Tá ið undanfarna landsstýrið tók við, tá

vør landskassans partur av netto uttanlandsskuldini 650 mió.kr. Hetta svaraði til umleið 17% av tí samlaðu skuldini. Tá ið undanfarna landsstýrið fór frá aftur, var landskassans partur av uttanlandsskuldini komin niður um 300 mió.kr. og tað svarar til umleið 4% av ti samlaðu skuldini, tað vil siga, at landskassin Atli Dam og Vilhelm Johannesen hava ikki verið við til at økt um uttanlandsskuldina hesi 4 árini. Taka við so teir almennu grunnarnar, Menningargrunnin, Ídnaðargrunnin og Húsalánsgrunnin so liggur tað púra fast, at hesir hava heldur ikki verið við til at økt uttanlandsskuldina. Teir fingu loyvi, at taka uttanlandslán tað fyrsta árið nevnliga í 1985, men síðan vístu vit teimum til aðrar lánimøguleikar her heima, teir vóru vístir til íleggingargrunnin fyri Føroyar, teir vóru vístir til íløgugrunnin á Føroya gjaldstovu, teir vóru vistir til tryggingina og tey seinastu 2 árini fingu teir so eisini møguleika fyri, at lána úr eljugrunninum. Taka vit so teir almennu stovnarnar, so hava teir heldur ikki økt uttanlandsskuldina hesi 4 árini frammanundan at hesi landsstýrini komu sum nú hava sitið í 1989. Vit finna orsøkirnar til uttanlandsskuldina aðra staðir. Vit hava t.d. eina felags kommunalan stovn sum eitur SEV hann eigur sín stóra part av ti stóru uttanlandsskuldini, vit hava stórar fólkaflokksstýrdar kommunur sum Tórshavnar kommunu og Klaksvíkar kommunu, tær eiga væl ein rættiliga stóran part av tí øktu uttanlandsskuldini og so hava vit tað privata, serliga handilslivið sum hevur gjørt stórar íløgur í stórar og dýrar handilsbygningar og harvið hevur handilslívið eisini økt munandi um uttanlandsskuldina. Fyri at hesir handilsbygningarnir skulu svara hvørjum sítt, so er neyðugt at nýtslan í samfelagnum veksur, teir mugu selja meir og meir og henda vaksandi nýtslan hon førir til ein størri innflutning og tann størri innflutningurin hann førir til eitt størri hall á handilsjavnanum og gjaldsjavnahalli veksur samsvarandi. Undanfarna landsstýrið bant 500 mió.kr. uttanlands, men samstundis tóku bankarnir 1500 mió.kr. heim og hesar 100 tals mió.kr. tær eru farnar tildeils sum íløgur í handilsbygningar og við tí

úrsliti, at okkara nýtsla er vaksin, at okkara innflutningur er vaksin og at bæði handils og gjaldsjavnahallið eru vaksin.

Nú verður nógv tosað um alment oysl um at, teir almennu stovnarnir brúka ov nógvan pening, at tann almenna umsitingin er alt ov stór og alt ov dýr, men eg haldi tað verða løgið, at eingin makrantíð tosar um bankarnar. Koma vit til eina bygd, har búgva kanska 500 fólk so finna vit sparikassan, vit finna 2 bankar, allir hava dýrar bygningar, hava gjørt stórar íløgur í bygningar, hava óneyðuga stóran rakstur og kundu í staðin fyri avtala sínamillum at ein er hesi bygdini og ein annar í hini bygdini og tann triði í tí triðu, men tað kemur ikki upp á tal, teir skulu allir hava sítt egna og gera tær heilt stóru og órímiligu íløgurnar og so verða rakstrar útreiðslurnar eisíni har eftir. Tann samgongan sum situr í dag, hon er í móti almennari stýring, hon er í móti, at tað almenna skal hava eftirlit við tí privata, hon er í móti eini og hvørji uppilegging og hvat er so úrslitið, jú, úrslitið er tað, at tað privata kann koyra sum tað vil, at bankarnir kunnu stýra uttan um tað almenn og vit fáa so hesi uttanlandslánini heim og hesar íløgurnar verða gjørdar í órentablar fyritøkur í handilsbygningar o.a.

Javnaðarflokkurin hevur í mong ár víst á, at tað var neyðugt at fáa ein landsbanka, at tað var neyðugt við einum stýringsamboði sum kundi stýra peningaflutninginum, peningastreyminum út úr landinum og inn í landi og tað eydnaðist so í 1978 at fáa lógina um landsbanka Føroya samtykta, men so kom borgarliga alternativi sæt har í 4 ár og syrgdi fyri, at landsbankin ikki fór at virka. Men Javnaðarflokkurin kom aftur í landsstýrið aftan á tað 4 ára skeiðið og tá var aftur farið í gongd við landsbankan og nú var komið upp undir land við at fáa hetta stýringsamboði at virka, men eftir øllum at døma so verða aftur nú atsøknir gjørdar móti hesum stýringsamboði, soleiðis at tað ókontrollerða kann halda fram, bæði við lántøkum og íløgum og hvørt av sínum. Støðan hjá landsstýrinum var góð øll tey 4 árini undanfarna landsstýrið sæt, landskassaroknskapurin sýndi

avlop øll 4 árini, gjaldførið var rímiliga gott alla tíðina, men so hendi tað, at eitt nýtt landsstýrið kom til, og har vóru nakrir ið skuldu spæla við musklunum sum skuldu vísa, at vit tora, at lata nøkur skip fara á húsagang, vit tora at lata nøkur virkir og fyritøkur fara á húsagang og úrslitið er so, at tey effektivu veðhaldskrøvini tey rapla inn til landskassin og landskassin stendur so
tómur og kemur í gjaldføristrupulleikar og tað førir so til, at landsstýrið og samgongan mugu út til borgarnar eftir meir skatti og meir tolli. Vandi er fyri, soleiðis sum hetta stýrið hevur borið seg at, so er vandi fyri, at landskassin hóast øktan toll, hóast bundna uppsparing og hóast onnur tiltøk kemur at fáa minni pening inn, enn hann hevur fingið. Tað er so íðiligt at hoyra fólk tosa um, at arbeiða svart, vit hoyra fólk tosa um, at flyta av landinum, vit hava t.d. føroyingar við grønlendskum skipum, teir gjalda 40% í skatt í Grønlandi og munin í millum 40 og tað sum er galdandi í Føroyum gjalda teir her heima, men nú í trekkið er fari upp á 60% og meir, nú er bara at flyta til Grønlands so missir tann føroyski landskassin eisini tær inntøkurnar og fólk í góðum árum við útbúgving og møguleikum tey flyta av landinum og harvið missa vit so eisini tær skattainntøkurnar. Svartar vørur, svørt barnaansing, tað er kunngjørt, at lógin um barnastyrk skal broytast soleiðis, at foreldur sum hava børn á dagstovnum tey skulu ikki hava barnastyrk og hvat ger man so, men tekur børnini út av dagstovnunum og fær onkran at ansa børnunum svart, so beheldur man barnastyrkin.

Tá ið hetta fíggjarlógaruppskotið var framlagt, ella nakrar dagar aftaná, tá hevði Dimmætting eina samrøðu við landsstýrismannin í fíggjarmálum Ivan Johannesen, har segði hann, her var rokningin fyri marglætí hjá Javnaðarflokkinum. Eg kom at hugsa um ejnaferð í 1988, tá legði Sambandsflokkurin eitt uppskot fram á ting, um at sambinda tær báðar sambandsbygdirnar Toftir og Strendir við einum undirsjóvartunnli, fyri at gera tað eitt sindur høgligari hjá Jógvan I. Olsen at vitja Johannes Martin Olsen á Strondum og umvent, var tað ikki

marglætið. Tað hevur verið sagt, at í Føroyum gongur 1 mia.kr. leys sum ikki kemur til skattingar og menn gremja seg um, at støðan hjá landskassanum er váralig, at landskassanum tørvar inntøkur, men samtíðis, so tekur maður og avmarkar, minkar játtanina til skattavaldið, til teir ið skulu syrgja fyri, at henda mia.kr. sum gongur leys kemur til skattingar, soleiðis at landskassin kann fáa tær inntøkur sum hann eigur at fáa.

Tað er boðað frá, at vit skulu hava vinningssteðg og samtíðis, so er játtanin til príseftirlitið eisini skorin. Somuleiðis er boðað frá, at prístalsviðgerðin av lønum skal avtakast og tað verður effektivt. Tann dag sum eitt uppskot er samtykt í tinginum, um at avtaka prístalsviðgerðina av lønum, so er hon avtikin og tað virkar 100% effektivt yvir fyri landsins løntakarum, men hvussu er voréið við vinningssteðginum, við prissteðginum, verður hann effektivur? Als ikki. Fyri tað fyrsta, tí, at hann er fráboðaður langt frammarundan at hann kemur og tað ger tað møguligt hjá handilslívinum at seta vøruprisirnar upp beinavegin áðrenn prissteðgurin kemur fyri tað næsta, tí at príseftirlitið verður skorið í sini játtan og verður ikki ført fyri, at hava eftirlit við, at vinningssteðgurin verður hildin. So tað vil siga, at tað verður løntakarin sum kemur at bløða, tað verður løntakarin sum kemur at bera ta tungu byrðina í hesum spælinum.

Eg ætlaði at tosa eitt lítið sindur um støðuna hjá fiskivinnuni. Fiskivinnan verður altíð nýtt sum syndabukkur tá ið tað almenna skal út til borgaran eftir meir peningi og tað verður hon eisini í hesum førinum og eg haldi, at hetta er ov biligt bara ferð eftir ferð at fara út til skattaborgaran eftir meir peningi tí at fiskivinnan er annahvørt í trupulleikum ella í kreppu. Hvat er galið við okkara fiskivinnu, vit selja alt alt ov illa. Tað er komið fram nú, frá sjálvum fiskasølustjóranum, at vit selja okkara fiskaútflutning fyri á hálvan prís og eg havi áður vist á, at t.d. innan fyri 1 viku, so eru 27 útlendskir sølumenn í Føroyum og royna at fáa okkum at keypa, hvussu nógvir føroyingar eru um somu tíð uttanlands og royna at selja okkara framleiðs-

lu? 1 hægst 2 kanska eingin. Vit fáa av og á reklamatiónir upp á okkara fiskavørur, men hesar reklamatiónir tær verða bara góðtiknar frá hond og tckur onkur seljari sjálvur stig til, at fara uttanlands at kanna nvat hald er í hesum reklamatiónunum, so vísir tað seg, at tað er púrt einki hald í teimum, men vit góðtaka bara, sláa av prisinum og tískil selja vit okkara vørur fyri hálvan prís sum fiskasølustjórin sjálvur hevur sagt einaferð herfyri. Tað hendi ein strukturbroytin við okkara fiskivinnu og henda strukturbroytingin hendi í sambandi við, at fiskimarkini vóru flutt út á 200 fjórðingar og í samband við, at kvotur í størri og størri mun vóru ásettar fyri veiðuna á ymsum havleiðum. Áðrenn hetta hendi, tá kundi føroyski fiskimaðurin fara út, og hann kundi veiða akkurát tann fiskin sum Føroya Fiskasøla tímdi at veiða, hann kundi veiða óavmarkaðar nøgdir av toski, hýsi, kalva o.s.fr. Men so hendi broytingin, fiskimarkini fóru út, fiskasløgini verða kvoteraði, nú kunnu vit ikki fiska óavmarkað av tí fiskinum sum fiskasølan kundi selja og nú var tað also fiskasølan sum skuldi lagt sín politikk um og sagt, at nú mugu vit selja tað sum føroyingar hava møguleika fyri at fiska. Fyrr fiskaði føroyingar tað sum fiskasølan hevði møguleika fyri at selja, men tað tykist at ganga rættiliga stríltí við fáa hasa umleggingina framda. Tað er helst eingin ivi um, at framleiðslan bæði umborð á okkara skipum og á okkara fiskavirkjum er ikki nóg rationel og ikki nóg effektiv og útreiðslustøðið er helst eisini nakað høgt, men tað er givið, at her kann nakað gerast bæði við søluna, framleiðsluna bæði umborð og í landi.

Miðsavning hevur verið nógv umrødd serliga upp undir løgtingsvalið síðsta heyst og tað var serliga Fólkaflokkurin ikki minst Jógvan við Keldu sum tosaði um miðspjaðing, men nú hava vit so fingið at vita, at undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund er útsettur og samtíðis hava tey konstaterað, at býráðsformaðurin í Havn, hann hevur arbeitt nátt og dag fyri at fáa henda flogvøllin á Glyvursnesi. Eg veit ikki um Jógvan við Keldu kann peika okkum á, hvar ið miðspjaðingin í hesum liggur, hvar er hon at finna.

Tjóðveldisflokkurin. Eg veit ikki hvat feilar Tjóðveldisflokkinum nú, hann er farin at tosa upp á tann mátan, at er tað nakað positivt sum er hent seinastu 4 árini, so hevur Tjóðveldisflokkurin ærðuna. Er tað nakað negativt, so hevur Javnaðarflokkurin skuldina. Mín góði vinur Heini O. Heinesen hann hevur givið okkum skuldina fyri nógv av tí minni positiva sum hendi og hvat hava vit so gjørt í landsstýrinum, jú, vit hava givið loyvi til nøkur skip, og Heini O. Heinesen sigur, at tað var púra galið at vit gjørdu hatta har. Tað var soleiðis, at mini oyru, tey vóru pípaði full í ár tíggund av Tjóðveldisflokkinum, at vit skuldu hava 200 fjórðinga fiskimark, tí hetta var okkara náttúrgivna lívsgrundarlag og so fingu vit fiskimarkið og nú fer Javnaðarflokkurin og gevur loyvir til nøkur skip og skulu vit gera royndir á hesum djúpa vatninum, nú sigur Heini, at vit dansa masurka. Eg skuldi siga nakað til Karin Kjølbro, men tað kann bíða.

Eg møtti eini 80 ára gamlari konu nú ein dagin og hon flenti, tað eru ikki fleiri enn so sum flenna í hesum døgum. So sigi eg, hvat er so stuttligt. Jú, hon hevði fingið fólkapensión og hon var trekt fyri millum 900 og 1000 kr. Hon hevði so vent sær til almannastovuna og líkningarráði fyri at spyrja, hvat hetta var fyri nakað. Jú, hatta var skattur og tvungin uppsparing sum hon skuldi fáa aftur tá ið hon fyltí 65. Ja, tað hevði sjálvur Pauli Ellefsen sagt her í tinginum at man far tað aftur tá ið man fyllir 65, men hon var also 80 ára gomul, men hon dugdi at flenna eftir tí.

Karin Kjølbro (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var til seinasta æraða røðara sum slóg okkara recursir upp í glens 200 fjórðínga fiskimarkið, okkara tilfangi sum vit hava trúð upp á og hava havt álit á í Tjóðveldisflokkinum. Eg hugsaði, at seinasti æraði røðari visti, at tað var nevnliga hetta livsgrundarlagið sum var forkomið við, at vit hava ein yvirkapacitet av skipum og at vit saktans kundu avskriva 100 skip og har-

umframt hevði okkara uttanlandsskuld verið munandi minnið um vit høvdu latið verða við at givið innflutningsloyvi til øll hasi skipini og har umframt tømt okkara grunnar. Hetta er also einki, at sláa upp í glens.

Vilhelm Johannesen (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Tann veiðiflotin sum vit høvdu, áðrenn fiskimarkið var flutt út á 200 fjórðingar, hann var samansettur út frá tí, at vit høvdu ikki 200 fjórðinga fiskimark, hann var samansettur út frá tí, at vit høvdu 12 fjórðinga fiskimark, at vit høvdu møguleika fyri, at veiða í Íslandi, í Norðsjónum í Grønlandi o.s.fr. Nú fáa vit 200 fjórðinga fiskimark og nú skulu vit út á eitt heilt annað dýpi at veiða, nú skulu vit út eftir nøkrum heilt øðrum fiskasløgum, enn teimum ið vit hava veitt fyrr. Tí var neyðugt, at gera nakrar íløgur at geva nøkur loyvir til skip, sum kundu fara at royna hetta djúpa vatnið. Eg slái ikki tað upp í glens, men eg sigi bara, at tað var eitt hjartamál hjá Tjóðveldisflokkinum at fáa fiskimarkið út á 200 fjórðingar, men tá ið man nú kann vísa á, at hesi skipini tey góvu ikki akkurát tað sum man hevði vónað. Ja, so er tað Javnaðarflokkurin sum hevur dansa masurka í Tinganesi og givið loyvi til hesi skipini. Also tað var ein roynd, tíverri, nakað av tí miseydnaðist, men nakað eydnast, tað hevði verið betur um alt eydnaðist tað vil eg siga.

Pauli Ellefsen (sb.)

Harra formaður.

Tað var undanfarni røðari sum í byrjanini av sínum innleggi var inni á spurninginum um millumverandi við útlondini, also um nettouttanlandsskuldina. Nettouttanlandsskuldin fevnir sum kunnugt um tað samlaða gjaldsjavnahallið hjá hesum samfelagnum mótvegis útheiminum. Javnaðarmenninir eru í ymsum periodum. Eg minnist m.a. í 1984 uppundir valstríðið. Tá vistu teir alt um netto-

uttanlandsskuld. Eg var norðuri í Klaksvík og har sat Vilhelm Johannesen og var ekspertur á økinum um uttanlandsskuld, tað var ikki tann detalja sum hann ikki vistí og tað var tað sama galt hinar javnaðarmenninar. Nú aftan á eitt valskeið frá 1984-1988 er farið, nú vita teir einki um nettouttanlandsskuld. Vit hava jú uppliva heimsins størsta roknifeil, vit áttu at komi í Geannes. Tað er einki land sum hevur gjørt ein roknifeil upp á 2,1 mia.kr. upp á 46.000 menniskjur, einki samfelag í heiminum. Nú renna javnaðarmenninir, teir tuska burtur frá øllum, og siga, at hatta er hagdeildin, hatta er Sigurð Poulsen, vit vita einki, vit kunnu ikki vita nakað um nettouttanlandsskuld. Tað seinasta er rætt. Men nú eru teir við at koma inn í eina nýggja periodu, nú byrja teir at fáa skil fyri nettouttanlandsskuld aftur. Veruleikin var jú tann, at Javnaðarflokkurin skuldi jú loysa okkara trupulleikar viðvíkjandi búskapinum, um teir komu framat, og hann skuldi enntá gera tað upp á 500 dagar. Hvat hendi? Og tað er tað reella úrslitið. Tað reella úrslitið er, at tit øktu okkara netto-uttanlandsskuld við 5 nýggjum mia. kr. So kann man sum Atli Dam, greiða frá, hví tað gekk so illa. Teir flestu føroyingar kenna onkran skipara, sum ger ringan túr og so ger langar forkláringar um, hví hesin túrurin var so vánaligur, men tað er eingin áhugi í tí, spurningurin er, hvussu var úrslitið? Hvat var í lastini? Tað var syndarligt hjá Javnaðarflokkinum seinast. Tað var talan um skeivan politikk og tað var tað sum gjørdi, at vit høvdu eitt vánaligt úrslit. Hatta er onnur síðan av sakini, hin síðan av sakini sum kanska í dag hevur størri áhuga tað er spurningurin um landskassan. Vilhelm Johannesen segði fullkomiliga rætt. Landskassin hevði tað gott hesi árini í seinasta valskeiði og tað var tað sum eg lýsti í mínum fyrra innleggi, landskassin fekk 100 tals mió.kr. av tí vaksandi nettouttanlandsskuld sum kom inn yvir Føroyar, minst til, 5 nýggjar mia.kr. netto í skuld. Ein stórur partur endaði av sær sjálvum automatiskt inni í landskassanum. 28% av øllum tilfari, 50% av øllum lønum, bæði til føroyingar og útlendingar, tað er tað klárt at landskassin hevði tað gott. Skal man

so tenja vøksturin í nettouttanlandsskuldini, so er tað líka so logiskt, at so hevur landskassin tað ikki so gott longur og tað er tí at tað er farið at sansa at av álvara og so er spurningur um at lána og har er tað ein veruleiki, at tann niðurgongd sum hevur verið í Føroyum inntil nú, tað er orsakað av, at útlendingar ikki longur eru so fegnir, at lána til føroyingar tí tað er so illa stýrt.

Vilhelm Johannesen var inni á sundurgreiningini á uttanlandsskuldini, tølini eru vælkend og sum formaðurin minnist, so segði ráðgevandi nevndin, at tølini til og við 1985 vóru rætt. Tað eru tølini seinastu árini sum hava givið skeivleika. Nettouttanlandsskuldin ultum 1981, var 1,2 mia.kr., ultimo 1984 var hon nominelt góðar 3, men, líka aftan á, seldi javnaðarlandsstýrið skip fyri 1 mia. kr. sum vóru fíggjaði í hesum trimum, og tá ið man selur aktivini sum man skyldar upp á og fær pengar fyri tey ella fær eftirgivna skuld, so ríkur skuldin eisini. Tað vil siga, at verulígi vøksturin í okkara landsstýrið var minnið enn 1 mia.kr., verúligi vøksturin í seinasta valskeiði var 5 mia.kr. Hetta eru tøl sum eru granskaði av bæði okkara egnu monnum og av útlendingum, soleiðis er tað bara. So sigur Vilhelm Johannesen aftur nú, at tað er tí, at vit høvdu ongan landsbanka. Í 1974, tá bleiv tað sagt, at tað var ómøguligt, at stýra hesum samfelagnum uttan ein landsbanka og tað kundi týtt upp á, at tað var rætt í 1981, tí tá koyrdi alt fast, orsøkin var, at vit høvdu ongan landsbanka. Xen, so komu vit aðrir til, vit høvdu stadivekk ongan landsbanka og vit vildu ikki hava nakran landsbanka. Vit fingu vent gongdini, so eingin kann í dag siga, at tað vóru fíggjarligir trupulleikar ultimo 1984. Tað einasta, og tað havi eg givið monnum rætt í, fiskivinnan stóð væl í tí, vit høvdu fóðra hana dekan og nógv tað seinasta árið, tað passar, men har vóru ongir fíggjarligir trupulleikar. So taka vit eitt nýtt valskeið, 1984-1988, teir siga, at vit kunnu ikki stýra uttan landsbanka, teir hava aftur rætt, nú stendur alt rímmar fast. Orsøkin skal verða, at vit hava ongan landsbanka. Tað er ósatt at trupulleikarnir eru tørvandi

stýringsamboð, trupullleikarnir hava staðið av, at tað hava verið vánaligir menn uttan hegni til at stýra. Soleiðis er tað. Far og set ein mann í ein bil sum ikki dugir at koyra, hann koyrir útav sjálvt um róðurgreiðirnar eru í ordan. Vit aðrir sum duga ógvuliga væl at koyra, vit eru á vegnum sjálvt um vit hava vánaligar róðurgreiðir, soleiðis er tað bara. Tað sum eg haldi stendur eftir yvir fyri føroyinginum í dag, tað er, hvat er tað fyri detaljur sum eru bornar fram her. Hvat er tað sum andstøðan vil, í staðin fyri tað vit gera í dag. Eg kundi havt hug at sett ein spurning fram, tað er. Nær er tað politiska mistakið verður gjørt, er tað tá útreiðslur verða samtyktar sum inntøkur ikki eru til at dekka, ella er tað aftan á, tá ið man manglar hesar inntøkurnar til at dekka útreiðslurnar og so aðrir menn fara út og heinta inntøkurnar. Nær er tað, tað veruliga mistakið verður gjørt. Eg meini, at mistakið er gjørt, tá ið man játtar uttan at hava syrgt fyri, at peningur er til at dekka hesar útreiðslur og tað er tann støða vit vóru í, tá ið vit komu framat. Landskassin var tómur, tað var ikki peningur til lønir. Man mátti saman við tjóðveldismonnum og fólkaflokksmonnum, niður at biðja Poul Schlüter og Nationalbankan um 200 mió.kr. í trekningsrætti aftrat. Hetta er tann veruligi sannleiki, tí, at tað var so illa stýrt.

Vit føroyingar liggja í grundini har sum vit sjálvir hava reitt. Eg skilji væl Karin Kjølbro tá ið hon blívur eitt sindur firtin yvir, at nevnliga Vilhelm Johannesen skal koma upp og siga hetta, men tað er ein veruleiki, at allir loysingar og yvirtøkuflokkarnir í 70'unum teir søgdu, vit skulu hava okkara egnu republik, vit skulu hava okkara egna landgrunn, vit hava ikki brúk fyri nøkrum øðrum. Tað bleiv rikin ein fiskivinnupolitikkur sum gekk út upp á tað. Vit skuldu fjerna okkum frá Danmark og restini av ríkinum, vit skulu klára okkum sjálvir. Samstundis skulu vit fremja yvirtøkur sum vit aðrir søgdu, hetta kemur at kosta okkum ov nógv. Vit hava eina fíggjarlóg í dag, sum er upp á 3,1 mia. kr. sum er til 46.000 føroyingar. Taka vit vøksturin frá tí og langt aftan á, at vit ávaraðu móti hesum, ja so

gongur sjón fyri søgn. Tað sum vit gjørdu tá, tað var tað, at vit í prinsippinum samtyktu eina røð av almennum útreiðslum, allir flokkar uttan Sambandsflokkurin, eina røð av útreiðslum sum vit aðrir í stóran mun máttu taka undir við, tí tað var yvirtikið, vit máttu fáa tað til at virka. Úrslitið í dag, er, at vit hava eina fíggjarlóg upp á 3,1 mia.kr., eina fíggjarlóg sum okkara framleiðsla undir ongum umstøðum kann bera, tað er tað sum er trupulleikin. Man kann diskutera, at flyta frá einum bólki til ein annan, frá vinnulívið til privat, og frá privat til vinnulívið. Vorulcikin er, at tað føroyska samfelagið er komið í trupulleikar orsaka av tí yvirtøku og loysingarpolitikki sum bleiv framdur frá 1974-1980 og sum bleiv framdur aftan á 1984. Har er tað Sambandsflokkurin kemur inn og sigur, at sjálvt um vit ikki taka okkum ábyrgdina av tí sum er hent, tí vit ikki atkvøddu fyri tí, har skera vit knívskart. Vit taka fulla ábyrgd einsamallir av øllum tí sum vit hava atkvøtt fyri, men tað sum vit ikki hava atkvøtt fyri, tað taka vit ikki ábyrgd av, men alíkavæl siga vit, lat okkum nú fáa hetta at virka og tað er tí eg kann endurtaka tað sum eg segði í minum fyrra innleggi. Vit í samgonguni, vit mugu fáa hesa fíggjarlógina longur niður, soleiðis, at vit kunnu trúgva upp á, at okkara framleiðsla kann bera okkara almennu útreiðslur. Annars ber tað ikki til. Vit kunnu ikki verða betjentir, at gera tað, og vit eru glaðir fyri, at vera í hesi samgonguni, eisini orsakað av tí, at vit hava hoyrt frá Tjóðveldisflokkinum og frá Fólkaflokkinum, at teir nú eru fúsir til, at loysa hesar trupulleikar sum teir gjørdu, saman við Javnaðarflokkinum. Eg vil siga, at Javnaðarflokkurin hevur verið tann frægasti og gingið undan har, men sum teir sjálvir hava fingið okkum út í, og tað eri eg glaður fyri. Eg eri eitt sindur væl nøgdur við, at tað er eingin andstøða á tingið í dag. Also nú er tað kanska skeivt at siga, at tað er eingin andstøða, tí vit høvdu Eliesar Arge her uppi í áðni og eg havi ongantíð sæð so nógvar menn blíva volaðar upp á so stutta tíð. Har vóru javnaðarmenn sum tóku seg av listanum og summir skræddi manuskriptið, Essa segði alt tað sum teir høvdu at sagt, men eg eri

eisini glaður fyri at verða í samgongu saman við Essa og tað sum eg vil endurtaka einaferð aftrat, vit skulu fáa eina fíggjarlóg sum ger tað. Nú var Essa so bangin fyri, at vit høvdu mist trúvirðið, men vit skulu gera eina fíggarlóg, samtykkja hana sum ger, at fólki hevur trúðvirði bæði yvir fyri Essa og okkum øðrum í samgonguni.

Vilhelm Johannesen (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Eg haldi, at hesar rangsnúgvingarnar hjá Paula Ellefsen, tær duga ikki longur, fólk hava gjøgnumskoða hatta tosið. Tað sum Pauli Ellefsen segði í 1980, vit skylda 1 mia.kr. uttanlands, tað er skomm, henda mia. má gjaldast aftur. Tá ið hann sjálvur hevur sitið í 4 ár, nú er tann eina mia. vorðin til 3 mia.kr. Nei, hatta ger einki, tí hatta er ikki landskassin ið skyldar tað, tað er ikki landskassin, hatta eru lán sum eru tikin til skip, til produktiv endamál og so viðari, hatta hevur einki við landskassan at gera og so vistí hann á, at niðrí í Danmark, har tosa teir altið um statsgæld, teir tosa ikki um hvat Danmark sum so skyldaði í Týsklandi ella í Frankaríki ella onkra aðra staðir, teir tosaðu um statsgæld og um statskassin ikki hevði ov stóra skuld so var alt í lagi, hatta segði Pauli Ellefsen fyri 4 árum síðan. Nú kemur hann Gud hjálpi mær aftur í dag, og sigur tað sama sum hann segði í 1980 og tað sum hann segði í millum 1980 og 1984 tað er gloymt, tað er farið í gloymibókina. Støðan er tann í dag, sum Pauli Ellefsen segði í 1984, landskassin stendur væl í tí, hvat ið skuld viðvíkjur, landskassin eigur bara 4% av samlaðu nettouttanlandsskuldini og tað brúktu danir sambært Paula Ellefsen sum mátistokk fyri, hvussu støðan var hjá danska statinum, so støðan hjá tí almenna Føroyum, hon er góð.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Vilhelm Johannesen hevur fultkomiliga rætt, harra

formaður í, at eg sigi tað sama í dag sum í 1980, og tað sama sum í 1978, 1979 og 1982 og 1983. Eg váttaði eisini at tølini við nettoutlanlandsskuldini við árslok 1980 tey vóru 1,2 mia.kr. og eg váttaði eisini, at tað vóru umleið 3 mia.kr. aftan á at vit høvdu sitið í 4 ár, men so vísti eg á, at Javnaðarflokkurin avreiddi farmaskipini og onnur skip fyri 1 mia.kr. og í teimum 3 mia.kr. har var fíggingin av hesum skipum, tað vil siga tað, at so er tann reella skuldin við árslok 1984 2 mia.kr. Tað er sólaklárt og so hevur enntá seinasta javnaðarlandsstýrið, so hevur tað økt upp til 7 mia.kr. tað vil siga 5 nýggjar mia.kr. men so vil eg fegin forklára, at tann økingin í nettoutlanlandsskuldini frá 1981-1984 har keyptu vit skip upp á yvir 2 mia.kr. 2,5 mia.kr. also farmaskip og fiskiskip og nettoutlanlandsskuldin minkaði við munandi minni enn tað. So er tað, at vit koma inn í javnaðarlandsstýrið har økja tit hana við 5 mia.kr. og keypa fiskiskip fyri 2,5 mia.kr. av teimum 5 mia.kr. samstundis sum, at bruttoútflutningurin ikki veksur í samband við nýinnvesteringar upp á 2,5 mia.kr. í fiskiskip, hatta er ein heilt onnur mynd. Í 1984 var tað ikki so vanskiligt, tí tá høvdu vit økt. Far og hygg eftir økingini í útflutninginum frá 1981-1984, hygg eftir stagnatiónini í útflutninginum frá 1984-1988 meðan tit investera 2,5 mia.kr.

Formaðurin

Nú endar so viðgerðin.

Ivan Johannesen fær orðið til framløgu av tingmáli nr. 3, veðhald fyri láni til SEV.

Ivan Johannesen (sb.)

Harra formaður.

Landsstýrið gav í vár elfelagnum SEV at taka upp lán, tilsamans 100 mió.kr. Lánið skuldi nýtast til fígging av leysaskuld í samband við vatnorkuútbygging í Eysturoy. Lógaruppskotið ljóðar soleiðis við formansins loyvi: Løgtingslóg um veðhald fyri láni til SEV. Lands-

stýrinum er heimila landskassans vegna, at veðhalda fyri uttanlandsláni til elfelagið SEV, svarandi til 50 mió.kr. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd. Hervið er málið framlagt.

Formaðurin

Síðan fær løgmaður orðið fyri framløgu av tingmáli nr. 2, broyting í løgtingslóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Løgmaður

Harra formaður.

Í tingsetuni 1987 var samtykt lóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. Lógin ásetur, at byrjast skal at gjalda inn í grunnin tann 1. januar 1990. Av tí, at nógv fyrireikingararbeiði enn er at gera, ymsar kanningar viðvíkandi ávirkan av lógini skulu gerast, skjýtur landsstýrið upp, at øll tíðarásetan í lógini verður útsett í 1 ár. Eg skal við formansins loyvi, lesa upp lógartekstin. Tað er løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. §1. Í løgtingslóg nr. 71 frá 9. juni 1988, um samhaldsfastanarbeiðsmarknaðareftirlønargrunn verða gjørdar hesar broytingar 1. Í grein 12, stk. 1 verður 1. januar 1990 broytt til 1. januar 1991.

Í grein 12, stk. 2 verður 1. januar 1990 til 31. desember í 1993 broytt til 1. januar 1991 til 31. desember 1994.

3. Í grein 12, stk. 3 verður 1. januar 1994– til 31. desember í 1995 broytt til 1. januar 1995 til 31. desember 1996.

4 Í grein 12, stk. 4 verður 1. januar 1996 til 31. desember í 1997 broytt til 1. januar 1997 til 31. desember 1998.

í grein 12, stk. 5 verður 1. januar 1998 til 31. desember 1999 broytt til 1. januar 1999 til 31. desember 2000.

6. grein 12. stk. 6 verður 1 januar 1991 broyttur til 1. januar 1992.

Í grein 12, stk. 7 verður 1991 broytt til 1992.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1990.

Hervið er hetta mál framlagt.

Formaðurin

So eru eisini nøkur skriv komin til løgtingið. Tað fyrsta er av Skála. Tað er undirskrivað av Viggo Holm, hvar hann sigur, at hann fer at minna á, at málið um sjúkrahús Millum Fjarða ikki enn hevur fingið eina sakliga viðgerð á tingi og at uppskot hansara stendur við, so leingi tað ikki hevur fingið tá viðgerð sum tað eigur at fáa. Eg haldi, at vit beina hetta máli til landsstýrið. So er eitt skriv frá arbeiðseftirlitinum, sum koma við eini frágreiðing um, at teir ikki eru nøgdir við tað viðferð teir hava fingið í hesum fíggjarlógaruppskotinum. Arbeiðseftirlitið vil tí hesum skrivi innliga heita á Føroya Løgting, landsstýrið og Løgtingsins fíggjarnevnd at ganga okkara umbøn á møti og taka okkara uppskot til fíggjarætlan fyri 1990 sum vit handaðu landsstýrinum 17. august 1989 til eftirtektar og skulu vit so við hesum 15% stóra niðurskurði gera okkara tilfar, fyri at sparitiltøkini verða hildin. Eg haldi, at vit beina hetta mál til fíggjarnevndina.

Tað er eitt skriv komið frá tekniska skúla í Tórshavn, hvar teir skriva: Vit loyva okkum vit hesum at gera háttvirda løgting vart við fylgjandi. So hava teir eina frágreiðing her, og enda við, at leiðsla skúlans vildi fegin fingið høvi til í fíggjarnevnd løgtingsins ella aðra staðir, at greitt nærri frá støðuni. Eg haldi, at vit beina hetta mál til fíggjarnevndina, so kunnu teir fáa høvi til har, at gera sínar viðmerkingar.

Eitt mótmælisskriv. Hóskvøldi 31. august 1989, helt ein bólkur av støkum uppihaldarum fund. Samtykt var, at senda soljóðandi skriv til landsstýrið og løgting og hetta skriv er eisini sent fjølmiðlunum, sostatt er tað tingmonnum kent. Tey enda við at siga, at vit heita hervið á løgtingsformannin at beina hetta skriv í

avvarðandi nevnd. Tað haldi eg at vit gera, við at beina tað í fíggarnevndina.

Eitt skriv frá Sinnisbæta. Felagið Sinnisbæti vil við hesum mótmæla teimum ætlaðu sparitiltøkum á uppskotinum til komandi fíggjarlóg í beinleiðis fara at raka tey sinnisliga sjúku og veiku. Tey hava eina nokk so drúgva frágreiðing og enda við, sum sagt mótmæla vit hesum ætlanum, men vit eru eisini altið tilreiðar, at tingast við viðkomandi politisku myndulleikar um hesi mál. Við vón um eina góða viðgerð. Eg haldi at vit beina hetta málið í fíggjarnevndina.

Havnar Arbeiðskvinnufelag mótmælir og átalar, at nú er ætlanin at fremja inntøkulógaruppskot sum raka vanliga lønmóttakaran óvanliga hart. Tey enda við at siga, at vit eru skelkaði og tí gera vit vart við sjónarmið okkara á henda hátt við hesum skrivi. Avrit av hesum brævi verður sent til fíggjarnevndina. So vit mugu lata hetta skriv fara til fíggjarnevndina eisini , so er tað íð hvussu so er avgreitt frá løgtinginum.

Eitt skriv frá Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum. Rørslubrekað inn á løgtingsins áhoyrarapall. Víst verður á hjálagda skriv í MBF hevur sent til umleið 150 almenn og hálvalmenn hús og fyritøkur í Tórshavn. Hetta verður gjørt fyri at minna á, at hesi hús eftir nútíðarkrøvum eisini skulu kunna nýtast av fólki sum av eini ella aðrari ørsøk eru vorin rørslutarnað. Eg haldi at vit beina hetta mál til formansskapin fyri løgtinginum, eftirsum tað er løgtingsins áhoyrarapallur tað snýr seg um.

Føroya handverksmeistarafelag hevur eitt skriv um almenn byggivirksemi og annlegsarbeiði teirra serliga í 1990. Aftan á fleiri ár við ov nógvum virkseni er tað nú øllum greitt, at vit nú eru fyri ógvisligum bakkasti fyri alt handverk, herundir skipabygging, byggivirksemi og annlegsarbeiðir, so sum havna-og vegagerðir, útstykkingar o.a. Eisini verða tænastufakini so sum bilverkstøð og skipasmiðir meint rakt. Tey hava eina víðari frágreiðing og enda við eini áheitan til landsstýrið. Við hesum viðmerkingum heitur Føroya handverkara felag á landsstýrið um at seta fleiri arbeiðir í gongd í 1990

enn ætlað og at syrgja fyri, at hesi arbeiðir bert verða latið føroyskum fyritøkum og føroyingum at gera. Føroya handverksmeistarafelag. Eg haldi at vit lata hetta skriv fara sum eina áheitan til landsstýrið.

Kongshavnar kvinnufelag. Fyrr í ár var ambulansustøð sett á stovn í Eysturoy. Nú bert nakrar fáar mánaðir seinni er ætlanin at ambulansastøðin í Eysturoynni skal niðurleggjast sambært fíggjarløgtingslógaruppskotið fyri 1990. Hetta kom okkum dátt við. Teir enda við at siga, at undirritaðu heita inniliga á Føroya løgting um at varðveita ambulansakoyringina í Eysturoynni. Við vón um at hetta verður gjørt. Vit beina hetta mál til fíggjarnevndina.

So eru nøkur mál við umsóknum, tað er fyrst Skálavíkar kommuna. Skálavíkar bygdaráð heitir hervið á samferðslunevndina um studning til brimskaða sum hendur er í vetur upp á 200.000 kr. Vit beina hetta mál til samferðslunevndina.

Frá Mikladals kommunu. Ein umsókn um løgtingsstudning til framhald av uppdyrkingarvegi frá Glatingarsteini og niðan á Háls í Mikladali og frá somu kommunu til studning til ein dyrkingarveg á Trøllanesi. Hesi mál verða eisini beind til samferðslunevndina.
Frá Vestmanna kommunu. Vísandi til viðløgdu umsókn til studning til vegir fyri 1989, loyvir Vestmanna kommuna sær at minna á, at svar ikki er afturkomið upp á nevndu umsókn dagfest 28. november 1988. Vónandi kann háttvirda løgting ganga hesi umsøkn á møti soleiðis, at kommunan kann fáa studning til øll 4 økini. Hetta er so ein umsókn sum hevur verið til viðgerar men tað verður sóknast eftir svarið. Eg haldi at vit beina hatta málið til samferðslunevndina. Sostatt skuldi øll hesi skriv sum komin eru higartil verið upplisin.

Hesin fundur verður so niðurlagdur og verður uppafturtikin kl. 10°° í morgin also mikudagin 20. september kl.10°° og tá er tað Karin Kjølbro sum er fyrsti røðari.

Fundur lokin.

Kl. er 17°°.

Jørgen Thomsen (fv.)

Harra formaður.

Tað er soleiðis fyriskipað, at tingi skal viðgera bæði løgmansrøðu og fíggjarlóg samstundis og hetta er vælskiljandi, tí tað hevur verið so sera ófriðaligt á tí politiska viðvøllinum og eg má siga, at fyri mína skyld er tað í besta lagi.

Eg fari eins og náttúrligt er, at gera nakrar saklígar viðmerkingar til fíggló og løgmansrøðu og ætlanin var, at nema eitt sindur við samgongusamráðingarnar sum vit skuldu eitast at taka lut í, men hetta hevur formaður okkara gjørt so greitt og tað sum eftir stendur er, at Sambandsflokkurin vildi ikki saman við Javnaðarflokkinum. Tað hevur eydnast afturhaldskreftunum í hesum landi, betur enn væl vil eg siga, við sínum svartskygni at sáa mistreysti niður í fólki. Hetta kann kortini ikki lesast av hesi løgmansrøðuna, tí eitt kann nú sigast um løgmann okkara at tað hevur ikki verið hansara lyndi at sáa mistreysti í fólki í hesum samfelag. Men løgmansrøðan er sera sera tannleys eftir mínum tykki og sør fyri eggjan framá og politiskt hvítur ikki av. Á fyrstu síðu er sagt frá í 21 førum, hvørji mál eru viðgjørd í eru viðgjørd í løgmansrøðuni og við smáum yvirskriftum verður lýst, hvat ið henda stutta sera stutta løgmansrøða snýr seg um. Hesi økið eita, fyri tað fyrsta, politiska gongdin, nr. 2 búskaparliga gongdin og so kemur ein rað, nøkur búskaparmál, búskaparlig tiltøk, fiskivinnumál, alivinnan, iðnaður, landbúnaður, skatta og tollmál, skúlamál, mentunarmál, orkumál, ferðamannavinna, almannamál, heilsumál, arbeiðaramál, kommunumál, umhvørvismál, samferðslumál, undirgrundin og sum tað seinasta samráðingarnar við EF. Alt hetta eru umráðandi og týdningarmikil mál, eingin ivi skal verða um tað. Men álvaratos, tá ið tú hugsar um, hvørjir flokkar standa aftan fyri henda politik og standa aftan fyri hesa røða, so kann tú ikki annað enn gerast bilsin. Ikki so bilsin tí at einki tjóðskaparmál er nevnt yvirhøvur tí her er tað Sambandsflokkurin ið ræður. Men tað er eitt sum ein

mátti býta merki í, og ógvuliga ávarsligt fyri mær. Landsbankin, sum var eitt ógvuliga grundleggjandi eitt stórt prinsipmál, bæði fyri Tjóðveldisflokkin, Javnaðarflokkin og uttan ívi fyri Fólkflokkin við ikki nevndur og hví. Á fíggjarlóginí síggja vit, at hesin landsbanki hann er munandi niðurskorin. At landsstýrið hevur havt í huga, at týna landsbankan niður sæst týðuliga í fylgisjølunum til fíggjarlógina. Landsstýrið hevur 27. juli í ár, sent landsbankanum bræv, har landsstýrið biður teir gera uppskot til játtan, men henda játtan skal haldast innan fyri karmin av 1 mió.kr. 11. august svarar so landsbankin landsstýrinum og sigur, at hetta letur seg ikki gera, lutvíst út frá gjørdum samtyktum í nevndini og lutvíst fyri at nytta kann fáast burtur úr arbeiðinum hjá hesum stovni, og so gera teir eitt uppskot sum javnvigar við sløkum 2 mió.kr. Teir siga víðari, um formaðurin gevur mær loyvi til at lesa tað sum nevndin sigur. Nevndin hevur samtykt útreiðslur til lønir og samsýningar upp á til samans 1.260.000 kr. henda upphæddin verður so skotin upp at játta undir grein 11 á fíggjarlóginí. Tað er ikki bara okkurt, men tað er alt ið bendir á, at landsbankanum verður eínki av í hesum valskeiði. Eg vóni so sanniliga, at bløðini eru burtur við tá ið tey prenta undirskjøl og tað kom eisini fram, at hetta var ikki nakað veruligt undirskjal, men eitt uppskot frá einum av teimum stóru flokkunum í samgonguni sum uttan iva er ímóti hesum landsbanka. Uppskotið var, um at avtaka landsbankan og gera hann til ein ráðgevandi stovn í fíggjarmálum. Betri kor hevur hesin banki uppiborið enn sovorðið. Tað eru tey ið halda við vissu, fíggjarfrøðingar, serfrøðingar í fíggjarmálum, at tað er eínki sum hetta samfelag hevur meir fyri neyðini, enn júst hetta at fáa landsbankan at virka fyri at fáa tamarhald á peningaflutninginum í hesum samfelag og kanska serstakliga til hetta samfelag. Fyri hesum banka, bardust tær gomlu politisku kempirnar her á tingið sum ikki eru í millum okkum longur. Frið halga verið minnið teirra. Tað tyktist sum um, at tað var torført at fáa steðga peningastreyminum til hetta samfelag, vit mugu viðganga tað, soleiðis sum formaðurin eisini gjørdi tað,

at tað var ikki alt sum hepnaðist fyri okkum og minni enn tað. Tað er nakað sum vantar í fyri at fáa tamarhald á peningaflutninginum í hesum landi og tí er tað, uttan iva rætt, at man setur á stovn ein landsbanka sum kemur at virka sum ein landsbanki.

Agitatiónin hjá Fólkaflokkinum undan valinum var stuttsagt henda. Niður við skatti, møguliga tolli við, so her er nakað í millum orð og gerir hjá hesum flokki. Vert er at minna á, at sjálvstýrissamgongan sum sat ta stutta skeiðið framanundan royndi tað ið hon kundi, at undirstrika hetta. Sama tað kom tí í samgonguskjali hjá teimum. Meirilutin í figgjarnevndini sum tá var, boðaði frá hesum í einum álíti til tingið, at teir vóru á somu leið. Háttvirdu løgtingsmenninir Svend Aage Ellefsen formaður og Niels Pauli Danielsen, Tórbjørn Poulsen og Heini O. Heinesen skriva soleiðis, við formansins loyvi, teir vísa til samgonguskjalið og siga. Meirilutin vísir á fráboðanum í samgonguskjalinum til partarnar á arbeiðsmarknaðinum um, at sitandi samgonga ikki hevur í hyggju at koma við nýggjum generellum inntøkulógum, men vil taka upp samráðingar við partarnar á arbeiðsmarknaðinum um lønarafturhald og í hesum sambandi viðgera møguleikarnar fyri skattalætta. So her hava menn verið inni á tí sama, at geva skattalætta. So er tað tað sjálvsama, tað kolveltandi herdir, støðan í samfelagnum kundi ikki broytast so nógv sjálvan valdagin, tí tað tykist sum um tað sær soleiðis út, tí inntøkulógir tær komu í ólukkumál sum føroyingurin kennir á sínum kroppi í dag, og sum uttan iva eftir mínum tykki í øllum føri eru alt alt ov ógvusligar. Undarligt, at vita skil á øllum peningaviðurskiftum í samfelagnum uttanlandsskuld og øllum øðrum, men ikki vita skil á hvussuleiðis ið støðan var, at man ikki hevði brúk fyri inntøkulógum framanundan valginum, men aftan á valið var ógvuliga neyðugt at fáa gjørt hetta. Í landskassaroknskapinum fyri 1987, har stendur uppgjørt á síðu 41 niðast, ein uppstilling yvir avlop landskassans fyri árið 1987. Nú er tað soleiðis sum formaðurin í figgjarnevndini segði tað, at tað vóru fleiri ár hvar vit høvdu gott yvirskot á figgjarlógini.

Sambært lóg nr. 107, frá 8. september 1988 skal yvirskotið býtast soleiðis og hetta var gjørt við eini lóg í løgtinginum. 40 mió.kr. í ráðfiskagrunnin og 50 mió.kr. til berghol og brúgvageragrunnin, restin skuldi í grunn til effektivar veðhaldsbindingar og sum gjørdist 231½ mió.kr. Hetta var tilsamans 321 mió.kr. tað vil siga, at ráðfiskagrunnurin fekk 40 mió.kr., berghol og brúgvageragrunnurin 50 mió.kr., og effektivar veðhaldsbindingar 231½ mió.kr. Tá hevur man figgjað eitt hall frá undanfarna landsstýrið uppá 80 mió.kr. so yvirskotið á hesi figgjarlóg hevur uttan iva verið umleið 400 mió.kr. Sambært hesi figgjarlóg sum vit viðgera í dag, tað vil siga fyri 1990, har stendur á síðu 22, útreiðslur tilsamans, har vísa roknskapartølini fyri 1988, 2.781.500.000 kr. hetta skuldi verið tað sum var brúkt. Uppskotið fyri 1988, tað var 2.820.000.000 kr. Eg havi roynt at spurt meg fyri á røttum stað og tað sum man far upplýst er, at figgjarlógin kemur uttan iva, at halda fyri 1988. Um roknskapartølini halda sum standa á figgjarlóginni so skuldi tað verið eitt yvirskot eisini í 1988 í millum 30 mió.kr. í avlopi. Men, tað eru fleiri eykajáttanir givnar í hesum árinum av hesum landsstýrinum sum skulu fara av figgjarárinum fyri 1988, men tað er nú kortini ikki so nógv, at tað skal nokk verða eitt yvirskot. Tað tykist, at hesin landskassarokn.skapurin stendur opin enn, tað verður arbeitt í tí landskassaroknskapinum í dag fyri 1988. Tað stendur fast, at tá ið vit tóku við, undanfarna samgonga í 1985, og Jóngerð Purkhús, háttvirda landsstýriskvinna og figgjarmálaráðharri, tá gekk føroyski landskassin við halli, stórum halli. Vit royndu at vísa á, at tað stóð munin betur til hjá landskassanum við ársbyrjan í 1989 enn tá ið vit tóku við 1. januar í 1985. Heini O. Heinesen vísti á hetta í 14. September og Jóngerð Purkhús háttvirda landsstýriskvinna hevur eisini gjørt vart við hesi viðurskifti sum náttúrligt er. Tá ið vit tóku við í 1985, tá hevði figgjarlógin sum eg sigi, eitt hall upp á umleið 80 mió.kr. trekkið úr danska tjóðbankanum var drigið á tamb, tað vil siga 100 mió.kr. og landskassin skyldaði lønajavningargrunninum umleið 100 mió.kr. og eg

haldi meg eisini minnast, at landskassin mátti gjalda umleið 14 mió.kr. í bankarentum fyri lønjavningargrunnin. Teir stóru grunnarnir á fíggjarlógini teir stóðu ikki væl í tí, tí var tað, vit settu í verk inntøkulógir til landskassan fyri at fáa javnvág í aftur. Men við árslok 1988, sær myndin øðrvísi út, tað er seinasta úri hjá undanfarnu samgongu. Trekkið á nationalbankanum tað var komi niður á 0, niðurgoldið og hóast at tað hevur verið tosa um trekk á fíggjarlógini, so kemur hon at halda í 1988 við, møguliga eitt lítið yvirskot. Tað verður eisini upplýst, at tað eru 200 mió.kr. komnar inn í oljugrunnin og har av eru 70 mió.kr. lántar til húsalánsgrunnin og 130 mió.kr. standa so í banka, ella tað stóð í banka í útlandinum. Stutt kann sigast, at tað stóð ikki illa til hjá sjálvum landskassanum í øllum førum við árslok 1988. Men at vit so seta alt ov lítið av peningi á fíggjarlógina fyri 1989 til Ráðfiskagrunnin t.d. um hann skal halda sama fiskaprísin, tað er ein onnur søga. Nú er tað so ymiskt sum ein sær upp á viðurskiftini. Tey eru mong ið seta spurnartekin við hvussuleiðis ið nýggja landsstýrið húsast úti í Nesinum. Nógv veðhøld eru blivin effektiv, tað er upplýst og tað er sjálvandi ein ræðulig byrða. Men, ein hevur eisini mangan hoyrt og ein hevur roynt at spurt um hetta, at hesi falnu veðhøld vóru mangan gjørdar avtalur um, vóru umløgd til lán, soleiðis at ikki alt verður goldi úr landskassans likviditeti í einum. Men tað verður kanska gjørt óbeinleiðis nú, á tann hátt, at man lænir pengarnar úr Tjóðbankanum í staðin, men trýfaldar trekki úr Nationalbankanum, tað er eisini eitt lán.

Harra formaður. Tað hevur eisini verið gjørt nakað burtur úr, at undanfarna samgonga vendi gongdini í hesum samfelag, tað var Pauli Ellefsen fyrrverandi løgmaður sum gjørdi nógv burtur úr, og Anfinn vísti á, at vit høvdu hall upp á 1 mia.kr. Nú hevur løgmaður sagt okkum, at vit skulu ikki brúka tølini aftan á 1984, tey eru ikki álítandi, men um vit hyggja á síðu 10 í fylgiskjølunum til løgmansrøðuna, so stendur har sagt frá um handilsjavnað Føroya. Í 1984, har hava vit eitt handilsjavnaðhall, hetta var árið ið føroyingar fingu

vent gongdini. 1984 hava vit eitt hall upp á 1.069.000.000 kr., tað er tað største hallið í øllum førum sum stendur á teimum papírum sum vit hava fingið úrflýggja í tinginum. Hetta árið trýfaldaðist uttanlandsskuldin og hesi 4 árini tvífaldaðist fíggjarlógin. So eg dugi ikki á at skyna hvussuleiðis og nær eitt verdir gongdini. Hyggja við so á síðu 26 í fylgiskjølunum, gjaldsjavni, har stendur niðast, nettouttanlandsskuld og í 1984 hava vit eina skuld upp á 3.060.000.000 kr. Tað er ið hvussu so er álítandi, sigur løgmaður. Annars haldi eg, at vit hava fyri neyðini, at fáa tey røttu tølini á borði soleiðis, at vit kunnu verða við til veruliga, at vita, hvussu støðan er og tað vóni eg, at formaðurin í fíggjarnevndini vil verða so beinasamur, at royna, at fáa tey papírini til vega sum í minst lagi tingmen hava fyri neyðini at fáa. Nú gjørdi Anfinn Kallsberg háttvirdi tingmaður nakað burtur úr. Hetta var eitt væla arbeiði sum landsstýrið legði úr hondum og legði niðan í tingið. Men eg haldi, at teir fiestu tingmenn eisini Jógvan Durhuus tóku undir, at hetta var helst tað vánaligasta hann hevði sæð, í síni tingtíð, fylgiskjølini. Tað eru nøkur brøv sett í ein brævordnara, tað er lítið meir at siggja har og tí verða vit noyddir vit sum sita í andstøðu, tá ið vit nú fara at viðgera hesa fíggjarlóg, at biðja formannin um, at fáa fólk inn sum kann hjálpa okkum at fáa eitt sindur av skil á hvat tað er ið stendur í hesum papírinum sum landsstýrið hevur lagt niðan her.

Karin Kjølbro (tf.)

Harra formaður.

Tað hevði verlð munandi hugaligari enn løgmansrøðuna og fíggjarlógina at viðgjørt tað áhugaverðu prædikuna við hoyrdu í Havnar kirkju á ólavsøku. Hugleiðingarnar um áttanda skapanardag kundi eitt nú, fingið løgtingsfólk at sett seg niður og hugsa um sín politiska arbeiðsdag í 80'unum hvørji svikabrøgd ella lokabrøgd liggja aftan fyri og hvørjar vónir ella kanska vónloysi

liggur fyri framman. Í hesi mini røðu, ætli eg, í fyrsta umfari at koma við nøkrum generellum viðmerkingum til tað politisku og búskaparligu støðuna og í øðrum umfari er ætlanin er nema við einstakar konti. Tað er valla nakar inni her, ið heldur, at tiltøkini sum eru framd í summar, hava verið serliga lystilig. Eg ivist eisini í, um tað hetta var tað einasta rætta. Tey ið hava samábyrgd fyri tí ágangi ið lønarfólk okkara hevur verið fyri í løtini kunnu í fyrsta lagi hyggja í løgtingstíðindi. Er tað spildurnýtt, tað sum hendir í hesum døgum? Er hetta eitt serføroyskt fyribrigdið? Óvist er, um fíggjarlógin kemur at halda, men ger hon tað, so verður nominella talið lægri enn árið frammanundan og tað er so í øllum førum nakað nýtt í føroyskum politikki.

Áðrenn tingið fór heim, so samtykti løgtingið broytingar í tolllógini og hevur tingið nýggja lóg um uppsparing eins og eykaskattur var lagdur á virkini. Talan var um at taka inn 180 mió.kr. ið skuldi berast til fiskivinnuna. Hetta er í 1989 krónum har fíggjarlógin javnvigar við 2 mia.kr. 180 mió.kr. av hesi fíggjarlóg er so nikið sum 5,6% ið verður tikið inn eyka og tað er also 5,6% av fíggjarlógini, tá ið blokkurin er íroknaður. Taka við blokkin frá, so eru 7,6% av fíggjarlógini ið er tikið inn í hesum árinum eyka. Tað er heilt greitt, at hesar mió.kr. tær hava nervað stóran part av fólki okkara. Tá hesin ágangur frá lønarfólkinum verður so nógv umrøddur, so er vert at nevna, at í 1980 var støðan eisini sera hættislig. Tá legði táverandi samgonga sum bestóð av Javnaðarflokkinum, Fólkaflokkinum og Tjóðveldisflokkin fram 4 inntøkulógaruppskot. Tey snúgva seg
um broyting í skattalógini, eykaskatt, broyting í innflutningsgjøldum og broyting í eykainnflutningsgjøldum. Uppnæddin ið kom inn tá, var 103 mió.kr. Fíggjarlógin tá, var 650 mió.kr. og uttanlandsskuldin var hin sama sum fíggjarlógin. Tað sum er tankavekjandi, tað er, at tann peningur sum var kravdur inn tá, var 15% av fíggjarlógini tað árið. Samstundin legði sama samgonga fram uppskot um at skrúða prístali aftur til 100. Tá henda samgonga í summar, tók inn 180 mió.kr. í hesum

árið, so verða vit noydd til, at seta hesa upphædd í samband við tíggjarlógina, ið er sum nevnt 3,2 mia.kr. og ein uttanlandsskuld ið er stívliga 6 mia.kr. Tað vil siga, at tann upphædd ið var tikin inn av javnaðar, fólka og tjóðveldissamgonguni í 1980 hon er lutfalsliga 2 ferðir so høg sum tað sum vit taka inn nú í 1989 samstundis sum vit mugu siggja í eyguni, at støðan hevur ongantíð verið so vánalig sum nú, búskaparliga tá var støðan ikki so ring sum hon er nú, og vit tóku tá lutfalsliga 2 ferðir so nógv. Hetta er tó ikki tikið fram fyri at verja ella legalisera tað ið er farið fram í summar, men heldur er tað, fyri at vísa á, at tá politikarar skulu taka inn pening so er heilt greitt, at flogið er lágt og evni til nýhugsan, tað er sera avmarkað. Til tess, at stytta um kjakið kundi verið áhugavert, at biði flokkar komi fram her og vísa á nøkur uppskot ið snúgva seg um, at útvega pening har tað ikki eru Palleba og Marsanna ið skulu gjalda. Aftan á 6 tímar í gjár, so hoyrdu vit ikki eitt einasta uppskot um hvussu peningurin skuldi útvegast. Tað er einki at ivast í, at Palleba og Marsanna hava havt svøvnleysar nætur í løtuni. Hinvegin ivist eg heldur ikki í, at tað eisini gava svøvnleysar nætur tá tað kom fram sum eitt óløgi at nettouttanlandsskuld okkara er stívar 6 mia.kr. Bruttouttanlandsskuldin er stívliga 9 mia.kr. og ognir okkara uttanlands eru 3,2 mia.kr. Hetta var tað við plagdu at argumentera við tá ið støðan var hættislig og vit høvdu stóra uttanlandsskuld. Harra Gud, vit eru so ófør at spara upp, vit eiga so øgiligar pengar uttanlands. Tað man fara og hjálpa okkum tá ið á stendur. Vit hugsaðu um pensiónskassan og hvørt av sínum alt hetta fáa vit nú borðreitt fyri okkum og siggja tað, at nettoskuldin verður 6 mia.kr. Eg haldi
vit skulu takka hagdeildini fyri, at vit fáa at vita hvussu støðan er. Tað er ógvuliga óhugaligt at fáa óbehagilig tíðindi at vita harra formaður. Mær tykir, at eg vil heldur vita tað óbehagiliga enn at ganga í ókunnleika og billa mær inn, at alt er so frálikt. Hóast tølini eru komin fram og eru lagnutung, so hugsi eg, at tey flestu, hóast alt eru takkson um at vita, hvussu støðan

er. Í seinastuni eru nong sum í máttloysi og illsinni hava gjørt vart við, at tey eiga einki í uttanlandsskuldini. Eitt lítið sindur er um hetta, tað er rætt at, landskassin eigur ikki tað stóra av uttanlandsskuldini. Stóra dýrið í hesi talluppseting eru privatu uttanlandslánini. Tá hetta er sagt, má leggjast aftrat, at nógv av hesum uttanlandslánum vóru ongantíð tikin um ikki landsstýrini í 80'unum góvu veðhald fyri hesum lánið. Landsstýrið hevði ikki tørv á, at taka lán, og tí er okkara skuld í landskassanum ikki so nógv økt, tí skatta-og tollpeningur floymdu inn í landskassan sum avleiðing av tí virksemi ið privatu lánini kastaðu av sær. Hevði landsstýrið kent sína vitjunartíð, so høvdu teir brúkt peningin til konsolidering ella neutralisera henda pening. Við at brúka teir til m.a. fantasiprojektir bæði á sjógvi og á landi, átók landsstýrið sær ábyrgd av hesum peningi. Also vit hava ikki stolið ella lænt peningin, men vit hava so sanniliga verið við til at brúka peningin og eg hugsi, at tey flestu kenna mun millum stjæler og hæler, og hvør okkara lutur er har og hvat ið er verri av tí. Ikki tí, ávaringar komu á hvørjum ári frá donsku vísmonnunum, ikki bert frá teimum, men eisini frá okkara egna búskaparráði, vit kundu eisini lesa svensk bløð sum góðskumettu okkara búskaparpolitik. Hetta hevur verið øll 80ini og áðrenn tað um nakar hevur tímað at goymt tað tilfarið vit hava fingið. Allir hesir búskaparfrøðingar tosaðu fyri deyvum oyrum.

Tá Atli Dam happar tjóðveldisfólk og alfaðirliga skrívar okkum eina heilsu í Sosialinum seinasta leygardag og sigur, at vit eru vorin handlangarar hjá dønum, tí vit eru farin at lurta eftir vísmonnum, so mugu vit svara aftur, álvaratos hóast alt so seta vit fákunnleika fram um fávitsku í Tjóðveldisflokkinum og um tað eru skil í ráðunum so taka vit fegin í móti teimum um tey koma úr Kina, Sovjet ella úr Danmark. Í hesum førum høvdu teir donsku búskaparfrøðingarnir rætt og okkara egnu hava sagt tað sama, vit nýtast als ikki fara til Danmarkar at argumentera við teimum, vit hava eitt búskaparráð sum hevur fært noyagtiga hesi somu tingini fram, so har er einki at sláa upp í glens og tað er

rættiliga pínligt má eg siga, tá ein politikkari við ábyrgd slær alt upp í glens sum embætisfólk og sum fakkunnleikin sigur. Tað er nevnliga ein av avleiðingunum av elendigheitini hjá okkum, at man ikki hevur tikið tær ávaringarnar og tey góðu ráðini í álvara sum vit fingu. Hvussu ofta hava vit ikki á fiskivinnutinginum hoyrt, at vit høvdu alt ov nógv skip til grunnar okkara. Kunnu vit siga, at vit eru ósek, tá ið vit støðugt góvu innflutningsloyvi til skip at niðurfiska stovnar okkara. Eitt er at ivast í, at í hesum landi, eru mong fús, at seta tæring eftir næring um tey kunnu sannførast um, at politikkarar okkara føra okkum úr ódnarveðrinum upp á turt. Tíverri er støðan júst hin øvugta. Fjøldin ivast í um tað nyttar t.d. er vert at spyrja løgmann, hvussu tað skal skiljast, tá hann í røðu síni sigur, at fleiri fyritøkur bæði á sjógvi og á landi máttu fara í likvidatión, men at summar av teimum tíbetur eru byrjaðar á einum sunnum grundarlagi. Spurningurin hjá Palleba og Marsannu í einum slíkum føri má verða, er hetta nýggjur vinnulívspolitikkur landsstýrisins og er hetta tað sunna grundarlagið at lata virkini fara í likvidatión og byrja umaftur fyri hálvan pris, tá landsstýrið og lønarfólkið hava goldið gildi. Annars eru tey flestu varug við, at løgmaður endar røðu sína við at siga, at í framtíðini verða almenn veðhøld burtur í figgjarskipan okkara. Eg veit ikki um vit skulu tora at trúgva hesum, men hetta eiga vit øll at leggja okkum í geyma og eisini verða vit at ansa eftir, at vinir og kenningar ikki fara at fáa mildar gávur í staðin fyri veðhøld. Tá tú sterdur við okkara gerðum í hondini og hugsar um tað ið ætlað verður at stinga út í framtíðini so er at siga, at vit ferð eftir ferð hava hoyrt um, hvussu illa mannað landsstýrið er, so sær tað tó út til, at tað er lagamarni at koma við uppskotum við inntøkulógum móti lønarfólkinum. Tað sum fyrst var aktuelt, tað vóru tær 180 mió.kr. til fiskiskipaflotan. Eg ivist ikki í, at fjøldin undrast. Vit hava so ofta hoyrt áður, at búskapurin í landinum var vánaligur. Vit hava tó í munandi longri tíð hoyrt um, at støðan viðvikjandi fiskiskipaflotanum var heilt út av lagi. Nærum

helmingurin av øllum okkara skipum kundu vit verið fyri uttan. Eisini hava vit fingið at vita, at flakavirkini hava alt ov stóran kapasitet. Hetta er tann óndi cirkulin, flakavirkini bera seg ikki, tí tey fáa ov lítið av fiski upp á land og so skulu tey hava nýggj skip og so er landsbúskapurin í vanda. Tað næsta er so tað at fiskigrunnarnir verða niðurfiskaðir, hetta er tann óndi Cirkulin sum vit enn ikki hava fingið steðgað. Tí er tað, at vit mugu spyrja, er tað rætt, at taka 180 mió.kr. frá lønarfólkinum bera tær til ein fiskiskipaflota ið er ov stórur og sum bæði beinleiðis og óbeinleiðis er við at beina fyri okkum og er tað soleiðis, at Tinganes hevur fólk sum í eini handavending eru før fyri, at smíða inntøkulógir og politikarnir eru førir fyri, at bera tær niðan í løgtingi, hví er so ikki møguligt, at koma við einum endaligum uppskotið um hvussu kondineringsgrunnurin skal virka. Hetta seinasta ið er ført fram, hava vit í 10 ár hoyrt frá búskaparráðnum, frá vísmonnum av fiskivinnutingunum og frá fiskimonnum, strukturbroytingar taka tíð, men 10-15 ár skuldi verið nóg mikið sjálvt hjá teimum tornæmastu. Tí er tað, at lønarfólki kennir máttloysi og kennir seg svikið. Nyttar hetta nakað? Førir tað til nakað sum helst og hví skulu vit rinda fyri ábyrgdarloysi politikarana. Tað er einki at ivast í, at mong kunnu ilskast inn á sokallaðu vinnulívsmenninar sum í stóran mun hava ført okkum í óføri. Svarið er bert, at hesir eru ikki farnir longur enn politikarnir hava loyvt teimum. Tað rokning ið vit fáa, kunnu vit ikki senda vinnulívsmonnunum tíverri heldur ikki politikarunum. Hana fáa Palleba og Marsanna og tað er prísurin fyri at velja skeivt. Ónøgdin er stór, vit hoyra fólk tosa um, at nú ætla tey t.d. at gera ein lønarflokk fyri lønarfólki, vit hoyra um ein grønan flokk, vit hoyra um ein kvinnuflokk og hetta er alt skilligt í løtini, men tað sum liggur nærmast, tað er verri og vandamiklari og tað er ein skattanoktarflokkur, tí ágangur er so stórur á lønarfólkið. Vit eru von við at taka væl eftir tí sum hendir í grannalondunum, vit kenna fortreytirnar sum vóru í Danmark og Noreg fyri teirra ultrakonservativa

skattanoktaraflokki og tað er tað sum vit hava góðar grundir til at stúra fyri nú. Tey sum altíð hava rindað helmingin av síni inntøku í skatt, tey kenna seg við tíðini bæði láturlig og sum hentir idiotar. Ábyrgd er altíð trupul at bíta, men vit koma ikki uttan um, at bæði moralskt og juridiskt eru allir flokkar á tingi ansvarligir. Øll skipaprojektini vóru ikki sett í verk um ikki landskassin veðhelt og enn minni vóru miklir handilsbygningarnir uppi á Hálsi bygdir, um landsstýrið hevði steðga realkreditlánum ið floymdu inn yvir okkum. Einki bendir á, at tann flokkur sum nú serliga tváðar hendur sínar ikki var í millum teir fremstu til bæði at játta skip og realkreditlán og gjøgnum landskassan at brúka peningin ið hesir kastaði av sær. Tað var beinavegin, tá henda samgonga sá dagsins ljós, at boðað var frá, at nú skuldu øll taka sær aðrar partar fyri, bæði Land kommunur og borgarar. Øll skuldu spara og hetta skuldi takast í ramasta álvara. Stutt eftir boðaði danska stjórnin frá, at mark skuldi setast fyri, hvat føroyskar kommunur kundu læna úr útlandinum. Flestu mundu tá halda, at hetta var hellt í tráð við politikk samgongunar og tí var tað als ikki til at skilja, tá løgmaður í somu viku boðar frá, at hann ætlar sær við tann spenta ál til Danmarkar at spyrja um teir meintu tað, tá teir skuldu seta mark fyri, hvat føroyskar kommunur kundu lána. Løgmaður fekk at vita, at danir meintu tað og eftir tí ið skilst, so arbeiða bæði landsstýrið og kommunurnar við at finna eina gongda leið so møguleiki alíkavæl er fyri at lána uttanlands. Er tað løgið at Pallieba og Marsanna ivast í trúðvirði samgongunar? Royndir vísa, at fólk okkara er tolið. Ikki eru tey uppdrigin til at renna undan rokningum og undan ábyrgdini, men at halda fram við at rinda raksturin eitt nú av fiskiskipaflota, sum er ov stórur og sum beinir fyri lívsgrundarlagið okkara. Tað kann tykjast ovboðið. Lønarfólkið kundi tí hóskandi svara, alt í lagi, vit skulu taka um endan einaferð aftrat, men treytin má verða, at tær broytingar sum skulu og noyðast at gerast við tí alt ov stóra fiskiskipaflotanum tær mugu avgreiðast fyrst.

Harra formaður. Um vit nú taka saman um, og hugsa

um tað frálíku ólavsøkuprædikuna so var m.a. sagt, um eg kann taka eitt brot burtur úr henni. So var m.a. sagt: Vit hava tann áttanda skapanardagin, nú tíðin er at liva mitt í spenninginum í millum, tá ið alt var sera gott og so tá alt aftur verður sera gott. Men tað ger ein vissan mun, um tú heldur teg liva í millum eitt forbannilsi og annað, ella tú livir ímillum eitt valsignilsi og annað. Staðfesta vi uttanlandsskuldina og tiltøk samgongunar og ógtryggleikan á arbeiðsmarknaðinum so má hetta elva til eitt vist vónloysi um man kundi staðið her, og staðið og tosa um vónina og dreymir og hvørt av sínum. Tað sum nú er, tað hevur lítið til at elva til vónloysi. Skulu fólk og føðiland eiga eina vón og trúgva upp á framtíðina og tað er tað eg hugsi at vit øll vilja, so er fyrsta treytin: Verður verulig stýring og ikki krotusmíð og vina og kenningapolitikkur. Lat tað verða vist, at landskassaveðhøldini eru farin í søguna at øll fantasiprojekt verða skrínløgd, at vit veruliga gera nakað fyrí at minka um uttanlandsskuldina og ikki taka upp nýgg uttanlandslán og at fólk okkara hvønn dag hevur eitt arbeiði at fara upp til.

Løgmaður

Harra formaður.

Eg haldi, at tað er ógvuliga týdningarmikið, at taka ið hvussu so er nakað til eftirtektar av tí sum seinasti æraði røðari segði og tað sum eg fyrst og fremst beit merki í, tað var at hon helt, at man skuldi taka støðuna, konstatera støðuna soleiðis sum hon nú einaferð er, og tað haldi eg eisini er tað fyrsta sum hetta landsstýrið hevur gjørt, bæði hetta landsstýrið sum nú situr og tað landsstýrið sum kom til í januar. Man tók og segði, hvussu leiðis standa vit í tí, hvat er støðan? So setur man út í kortið har eftir, og tað gjørdu vit so, og vit komu fram til, at tann búskaparliga støðan hon var serdeilis vánalig, og vit gjørdu so nøkur tiltøk fyri at bøta um hetta. Eitt tað fyrsta sum var gjørt, tað var, at man gjørdi at verri tað fáa donsk kreditforeiningslán. Vit komu eisini niðan í tingið við

uppskotum um búskaparlig og fíggjarlig tiltøk. Tað vóru hesi tiltøk sum onkrir av táverandi flokkum ikki kundu taka undir við og tí fór tann samgongan í søguna og ein nýggj var skipað sum so hevði somu sjónarmið og sum faktiskt logði stórt sæð sama politikkin í øllum øðrum prinsippielt akkurát sama politikkin sum tann fyrra, men broyttu nøkur av teimum praktisku uppskotunum sum so seinni vóru samtykt í summar. Tá ið eg hevði orðið í gjár, tá endaði eg við at siga, at eg helt ikki, at tað sá so myrkt út sum menn vildu gera tað til, og eg skuldi koma við nøkrum nærri grundgevingum um, hví ið eg ikki helt, at tað sá so myrkt út fyri framman, sum menn nú vilja gera tað til. Tað sum hendir í hesum døgum og tað sum faktiskt er hent nú, teir mánaðir ið hetta landsstýrið hevur sitið tað er, at man hevur konstaterað hvussu vánaliga tað stóð til bæði landsbúskaparliga í heila tikið og eisini hjá sjálvum landskassanum. Tað er rætt, at meginparturin av tí sum er hent tað hevur girgið skjótt, tey seinnu árini, men tað er ikki øll skuldín sum liggur á teimum seinastu 4 árunum og vit kunnu sjálvandi ikki bara siga, at tað er útilukkandi seinasta valskeið og seinasta landsstýrið sum hevur alla skuldina fyri hesum her. Men sum seinasti æraði røðari segði, so lurtaði tað landsstýrið heldur ikki eftir ávaringum um, hvussu tað stóð búskaparliga til, men man lat standa til, man gjørdi nógv tiltøk, man fór út í nógv projektir av ymsum slag, bæði í tí almenna sektorinum og eisini í tí privata sektorinum og vit sita eftir við sviðanum í dag og tí máttu vit gera og mugu vit gera tey tiltøk sum vit deils hava samtykt og sum liggja á borðinum sum eru klár til samtyktar, og sum annars eru avtalað í tí samgonguskjali sum hesir tríggir flokkarnir hava undirskrivað. Tað er bæði gott og sunt, at man viðgerð allar hesar trupulleikar, tað er gott og sunt, at man hevur orðaskifti um tey, men tað er í øllum førum eitt sum ræður um og tað er, at tá ið hetta nú skal gerast sum vit vita er neyðugt, so ræður um ikki at rysta á hondunum. At man nú sigur, at hetta má gjøgnumførast, hetta er forútsetningurin fyri, at tað verður betri. Vit vita, t.d. úr plantuheiminum, at tá ið eitt træ hevur voksið

vilt og voksið seg stórt so verður tað ofta skorið rættiliga langt niður fyri at tað kann byrja at veksa av nýggjum fyri at tað kann líka sum aftur prýða um havan og um umhvørvið og tað er soleiðis við tí føroyska samfelgnum í dag. tað er í veruleikanum voksið vilt og tí eru tað nøkur ting, ið mugu skerast burtur og vit fáa eitt træ sum gott nokk er minni men tað fær møguleika til at veksa uppaftur av nýggjum. Til tað krevst tey tiltøk, sum vit nú hava gjørt. Vit hava nakrar inntøkulógir í form av tolli. Vit hava eina tvungna bundna uppsparing og vit leggja framvegis dent á, at sjálv inntøkuskattalógin er ikki broytt, og at inntøkuskatturin tí ikki er øðrvísi enn hann hevur verið. Tað er ein uppsparing sum verður kravd inn frá fólki. Eg kann sjálvandi gott vaska mínar hendur og siga, at eg og okkara flokkur, vit ynkstu ikki, at hon skuldi verða tvungin, vit ynsktu at hon skuldi verða frívillig, men vit hava gjørt eina samgonguavtalu um, at hon skuldi blíva tvungin og tað mugu vit sjálvandí standa við. Tað er púra greitt og so hava vit fyri sovítt ikki meir at diskutera um hvat vit annars ynsktu og hvat vit hildu verða best. Vit ganga undir tað avtalu sum vit hava gjørt. So verður sagt, ja, men vit mugu ikki fara og krevja meir frá skattaborgarinum, men ein av fyritreytunum fyri, at vit ikki skulu krevja meir frá skattaborgarinum, tað er at vit . (Band skift)

Niels Pauli Danielsen (kfff.) viðmerking

so at eg dugi ikki at skilja myndini hjá løgmanni, tað kann ikki verða meiningin, at hann skal leggjast á pensionistar og børn og lønmóttakaran at skera niður fyri at hinar greinarnar sum eru kanska meir og minni følnaðar, summar av teimum skulu fáa loyvi til at verða sitandi ella hvat. So fari eg eisini at minna løgmann á, at veðhald, at sleppa landskassanum undan veðhøldum. Nær byrjaðum hesi veðhaldini? Jú, tey byrjaðu meðan Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin ráddi í Føroyum, tá byrjaðu tey. Síðsta landsstýrið ella landsstýrið sum sæt frá 1985-1988 tað royndi at minka um veðhøldini, fekk

tey heilt niður á 10%. Tað er ikki nakað sum løgmaður hevur funni uppá, nei, hann gjørdi tað mótsatt tá hann ráddi saman við Paula Ellefsen frá 1980-1984. Hann byrjaði at veksa um veðhøldini, tað tekk einki loyvi at koma hvørki virki ella skip uttan at Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin dýkti tað undir í veðhaldi sum vit royndu at minka um. So hetta sum hann tosar um struktur-broytingar, hatta er nakað sum síðsta landsstýrið byrjaði upp á, ella landsstýrið frá 1985-1988 langt áðrenn hansara tíð.

Suni Jacobsen (sb.)

Harra formaður.

Tríggir mánaðir eru gingnir síðan teir tríggjir floksformennirnir fyri Tjóðveldi, Sambandi og Fólka-flokkin løgdu, sum tað stendur í kvæðunum sínum ástum saman og lovaðu hvørjum øðrum trúskap um ikki ávigan í fyrstu syftu, so fyri restini av valskeiðnum fram til 1992. Hetta er fyrsta løgmansrøðan og fyrsta viðgerð av løgtingsfíggjarlóg sum sitandi samgonga hevur lagt fyri tingið. Politiska gongdin eftir vali 8. november í fjør hevur verið merkt av, at tá ið krubban er tóm versnar atburðurin hjá hestinum um teir ikki bítast í fyrstu atløgu. Sum kunnugt, so misti sjálvstýrissamgongan meirilutan í mei mánað í ár, tá samgongan legði inntøku-lógir fyri tingið av teirri einfaldu orsøk at inntøkur-nar á fíggarlógini vístu seg, at verða yvirmettar, meðan útreiðslurnar vóru undirmettar. Sjálvstýrisflokkurin tók ikki við skipsboðum, men vildi heldur sita heima og raka í øskuni vildi onkur verða við til í gjár, men soleiðis var ikki. Hann mynstraði, men leyp yvir borð, tá hann legði til merkis, at í lugarinum vóru eingi silkisnórar at klippa, har var pumpuroykur og har skuldi gjaldast fyri ymsar dansir og yvirtrekk og nú skamblar hesin gamli sjálvstýrarin móti landi á tí bjargingarbelti sum merkt er ítøkiligar loysnir í 90unum, gloymi 80ini. Eftir drúgar tingingar var so núverandi samgonga skipað, sum fekk tær nógv umrøddu inntøkulógirnar samtyktar. Høvuðsinntøkan er tann nógv umtalaða bundna uppsparing-

in. Tað er eingin loyna, at tað er við ringum tannabiti, at ein er við at krevja hesar inntøkurnar inn, uttan at at hava kunna tikið lut í at býtt tær út. Harra formaður. Teir sum býttu út eru skaðaleysir og sita nú í andstøðu og minna ikki sørt um líknilsi um hin burturvilsta sonin, sum fór til faðirin og kravdi sín rætt. Munurin er bert tann, at teir fóru út, spiltu um ikki alt, so rættiliga nógv burtur og vendu heim, sita hendur í favn, ira seg ikki yvirhøvur, men siga, at tað vóru hinir; vit hava onga skuld. Tað er einki at reypa av í 1989, at lógir verða gjørdar, her hugsi eg um tað bundnu uppsparingina sum siga, at fólk í mesta lagi skulu gjalda 65% og við eftirkanning hava tey goldi 70%. Tað er líkningarráði ið umsitur hesa skipan og sama ráð nýtir næstan 50% av síni játtan til EDV útgerð. Harra formaður. Eg sigi tað í øllum lítilætni. Tað verður brúkt ov mikið á EDV økinum uttan at vanligi skattgjaldarin far tað neyðugu tænastuna. Men eitt er givið, tí fíggjarligu mýru ið Javnaðarflokkurin hevur ført hetta land út í, koma vit ikki úr, uttan at hvør einstakur kemur at merkja tað á egnum kroppi. Uttanum tos, at tosa um nálastríputar og Palleba í hesum lítla landi, tað gongur ikki, tað vistu teir væl sjálvir. Og av forvitni havi eg kagað í tað upplegg teir sjálvir gjørdu um tað skuldi hent, at Javnaðarflokkurin kom í eina samgongu. Har stendur, við formansins loyvi: Kommunurnar tær skuldu ikki skylda meir enn 1-1½ álíkning, tær flestu eru væl omanfyri 2 í dag. So tað hevði nan merkt, tað skuldi minkast um íløgurnar, tær skuldu verða toygdar yvir eitt longri áramál ella útsettar. Tað er júst tað sama sum vit gera og umhugsað verður bundin uppsparing og um at lata skattaborgarar at koma undir økt skattatrýst, also øll skulda undir eitt økt skattatrýst. Hetta vóru nøkur búskaparlig tiltøk teir ætlaðu at seta í verk og hesi høvdu tú og eg merkt á egnum kroppi. Í einum demokrati hevur tað alstóran týdning at hava eina andstøðu sum samvitskufult fylgir við ið tí sum gjørt verður. Lurtarin hevur uttan iva lagt sær í geyma, at andstøðan hevur einki at føra fram. Undanfarni løgmaður Atli Dam hevur í seinastuni leikt sum selur á sundi, ikki bara

við botnin og omaná, men serliga innan fyri mark hjá Tjóðveldinum, hvar hann heldur seg hava serligar skyldur at minna á, at hann er tann einasti rætti. Man hann tevja eitt fólkatingsval
og vænta sær ein part av stuðulunum.

Tann stóra uttanlandsskuldin, føroyingar hava, betir ikki um kreditvirðið, men tað er ábyrgdarleyst, at endurtaka uppí saman, at tað er hon, sum ger tað neyðugt við inntøkulógum. Seinasta samgonga heystaði fruktirnar av hesi skuld. Bygningar, um teir vóru til tænastu ella framleiðslu ella bilar. Toliur, avgjøld og skattur, endaðu øll í landskassanum. Í einari frágreiðing frá Likningarráðnum, stendur millum annað, at frá 1985 til 1987 hækkar rentufrádrátturin við 75% meðan tann skattskyldúga inntøkan í sama tíðarskeiðið bert hækkar við 30%, og orsøkinar skuldi vera rentuspekularión og tey lán, sum menn tóku, sum vóru komnir ílla fyri av farmaskipunum. Hvat sigur føroyski skattgjaldarin til hetta her, at undanfarna samgonga, við Atla Dam á odda, visti um eina stóra rentuspekulatión í fleiri ár, uttan at teir rættu hond frá síðu fyri at støðga hesum. Tað hevur henda samgongan í øllum førum avgjørt at gera.

Og aftur til løgmansrøðuna. Har verður undirstrikað, at tað er ikki av kærleika til hvønn annan, men heldur av kærleika til landið og tað sum upp er bygt, at hesir flokkar eru gingnir saman. Tað verða eingi mørk flutt. Vit fara eftir førimuni at royna at røkja tað vit hava. Vit eru vitandi um, at meginparturin av tí lið skapar pening í hesum landið hýkur á knøum og er um at missa mótið, meðan tað frægasta sum Sosialurin upprekla-merar rýmir av landinum. Vinnulívið hevur brúk fyri einum herðaklappi. Tað hevur greinin fiskivinnan fingið frá hesum landsstýri.

Harra formaður!

Politiskt er neyðugt, at fáa skattgjaldaran at trúgva, at tað sum hann nú skal gjalda, verur nýtt til at fáa skil á hesum samfelagnum aftur. At vísa á, at allar góðar kreftir mugu arbeiða saman, so hjólini kunnu mala.

Takk fyri.

Lasse Klein (sj.), viðmerking

Harra formaður!

Tað var undanfarni røðari, háttvirdi tingmaður Suni Jacobsen, sum tosaði um hetta, at Sjálvstýrisflokkurin rakaði í øskuni, og hann segði tað, at vit vildi ikki minnast aftur á 80ini og at vit tosaðu bara um tann framburðin sum skuldi henda í 90inum, og um at klippa silkisnórar og so framvegis. Eg haldi at hann tosar ikki um tann framburð, sum er hendir vesturi í Vágum, ti at størsta framburðstíð nakrantíð á samskiftisøkinum, hon er júst hend í tíðarskeiðinum 1985 til 1980, og hví, júst tí, at bæði Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin vórðu uttanfyri alla ávirkan í føroyskum politikki. Vágatingmennirnir teir siga einki um, at býráðsformaðurin í Havn er í ferð við at taka flogvøllin frá Vágunum og leggja hann út á Glyvursnes. Tað hevur annars verið sjorgurin hjá teimum í undanfarnu umrøðum, at leggjast eftir býráðsformanninum har, men nú tá býráðsformaðurin hevur gjørt álavara av hesum, nú hoyrist einki frá teimum, og tað haldi eg er sera løgið, tí tað haldi eg ikki, at Vágafólk hava uppiborið, at tøgn nú valdar á tingi.

Suni Jacobsen (sb.), viðmerking

Harra formaður!

Heilt stutt til Lassa Klein. Hann sigur at býráðsformaðurin í Havn hevur gjørt álvara av gera ein flogvøll. Eg veit ikki hvat álvara er í tí. Hendan samgongar hevur samtykt eina íløguætlan, og í tí íløguætlan er eingin flogvøllur á Glyvursnesi.

Jógvan Adolf Johannessen (jv.)

Harra formaður !

Fyrst eini tvey fátæk orð til teir seinastu talararnar, sum hava verið her uppi.

Tað er ein óreingjandi veruleiki, at ótamd sosia-

lisma, eins og ótamd kapitalisma, eru báðar óbrúkuligar. Tað er eisini ein veruleiki, at einasta trygd fyri hesum er javnaðarrørðslan. Tí nyttar tað so lítið hjá háttvirða harra løgmanni og háttvirða løgtingsmanni Suna Jacobsen, at billa fólki nakað annað inn. Tí hvussu sær andlit kapitalismunar út, tá ið hin politiski gekkaskorturin er skriktur frá? Jú, har heglar hvør omaná øðrum og í hesari náðileysari kapping, eru tey veikaru í samfelagnum tapararnir. Tí er tað neyðugt, at Javnaðarflokkurin ansar eftir, at her verður ikki farið út um mark.

Harra formaður!

Tað er fíggjarlógin fyri 1990, sum er til viðgerðar, og eg má ásanna, at hon er eingin hugnaligur lestur. Hinvegin má eg eisini ásanna, at eg ikki eri serliga bilsin, tá ið eg hugsi um, hvørjir teir flokkar eru, sum eru upphav til hesa lóg, teir flokkar sum mynda tað landsstýri, ið vit nú hava. Men máti skal kortini verða við øllum, og hóast alt, so hevði eg kortini ikki trúð, at landsstýristriumviratið var so einoygt, at teir veruliga hugsaðu sær, at tað ber til at mergsúgva fólk og kortini trúgva, at landskassin kundi fáa meira toll og skatt burtur úr sama fólki, tí tílíkt ber als ikki til. Tað er mark fyri hvussu langt tú kanst spenna bogan áðrenn hann brestur. Og tað er heldur eingi at ivast í, at tær 195 milliónirnar, sum tit ætlaðu at kroysta burtur úr føroyingum afturat, als ikki kunnu kroystast, men hin vegin missa tit væl meira enn hesar 195 milliónirnar, við øðrum orðum, tað verður eitt dundrandi hall á fíggjarlógini. Tit fáa minni tollintøkur, tí minni verður at keypa fyri. Tit fáa minni í skatti, tí minni arbeiði verður.

Men eitt megnaðu tit, hóast eg haldi, at tað tænir samgonguni til lítlan heiður. Tit megnaðu kanska at reka fólk við góðum inntøkum av landinum og tit megnaðu eisini at gera korini hjá føroyingum sum heild vánaligari. Tit megnaðu eisini við tykkara óhugnaliga svartskygni at sáða mistreysti millum føroyingar og at enda megnaðu tit eisini at minka um arbeiðshugin hjá fólki. Men, tað syndarligasta av øllum er, at hesi tiltøk tit

settu í verk, virka beint øvugt, av tí tit ætlaðu. Tit skóru óhugnaliga djúpt, men skurðurin kundi ikki annað enn miseydnast, og miseydnaður er hann.

Eisini varð sagt, at fólk skuldi fáa peningin aftur, tá ið tey høvdu fylt 65 ár, men fólk millum 65 og 100 ára hava eisini fingið skattarokning, so kanska meiningin er, at hesi fáa peningin aftur, tá tey fylla 165 ár. Sama ger, um tey fáa hann aftur næsta ár. Innkrevjingar hátturin er fullkomuliga láturligur. Fólk yvir 65 skuldu sjálvandi ongan eykaskatt fingið. Og kann teldukervið ikki greiða uppgávuna, so er hetta ikki minni láturligt.

Tað er nakað sum eitur at spara seg inn í armóðina. Og hesum arbeiðshátti eru teir borgarligu fullkønir í, tí teir hava roynt hann áður og við syndarligum úrslitið. Men, at teir skuldu fáa fylgi av Tjóðveldisflokkinum, sum ikki einans hevur sagt seg at verða einasta tjóðskaparflokk í Føroyum, men eisini hevur roynt at billa fólki inn, at hann var arbeiðara- og fiskimanna flokkur nummar eitt, tað mundi koma mongum av teimum, sum høvdu álit á hesum flokki, dátt við. Men tað ber nú ikki til at liva av innbilskum og stórum orðum.

Sum longu nevnt, haldi eg, at tey tiltøk ið gjørd eru, gera bara ilt verri, serliga tá ið farið er so bonskliga fram, sum í hesum føri. At tit hava gjørt tykkum sjálvum eina bjarnatænastu, er ikki at harma, men at tit hava gjørt landið og fólkið eina tílíka tænastu, tað harmist eg um.

Leingi havi eg hoyrt um ein sokallaðan bygdarmenningar politik. Hinvegin má eg ásanna, at lítið ella einki hevur verið sagt um hvussu hesin bygdarmenningarpolitikkur skuldi skiljast ella hvat meiningin í heila tikið var ella er við einum tílíkum politikki. Nú er tað soleiðis, at í hesum samfelag, sum vit liva í, als ikki verður hugsað um at røkja landið sum eina heild og hesin hugsunnarhátturin hevur gjørt, at fólki stúgvast saman á nøkrum ávísum økjum, sjálvandi, tí at nær um øll landsins orka er løgd í hesi øki. Har er fyrimunurin tí størstur og hentleikarnir flestir, og verða framvegis fleiri mótvegis øðrum økjum í landinum, og tá kanska

serliga tí valdømi, eg umboðið. Í Sandoyar valdømi búgva okkurt um 1800 fólk. Tað er skiljandi, at tað er ógvuliga torført, fyri ikki at siga ómøguligt, at fylgja við

í kappingini móti teimum størri økjunum. Og av teirri orðsøk, at tilboðini á teimum størri økjunum eru betri, er fólkavøksturin í Sandoyar valdømi ikki stórur. Fólk flytur sum kunnugt til, har sum tilboðini eru størri, og har nýta tey plássini gott av tí náttúrðliga fólkatilvøkstrinum, sum skuldi veri í Sandoyar valdømi. So leingi hugsunnarhátturin er hann, at býtast skal eftir fólkatalið, so nýtist tú ikki at ivast í, at gjógvin millum tey stóru økini og Sandoynna verða alsamt størri. Hóast Sandoyggin útflytur uppá seg einar fimmferðir lutfallsliga so mógv, sum til dømis Havnin, so er tað munur á inntøkuni á báðum støðum fyri tilvildarliga at nevna onkran at samanbera við. Aftur til gandaorðið bygdamenning. Eitt amboð í hesari sonevndu bygdamenning er sjálvandi, at tað er lætt at koma til og frá teimum smáu bygdunum, og tað man hava verið við hesum í huga, at bergholini og vegirnir til tær fjarðskotnu bygdirnar eru gjørdir, hóast summir av teimum komu í seinna lagi. Men tá ið onkur helt fyri nú um dagarnar, at nú vóru vegirnir í Føroyum somikið góðir, at nýgerðir toldu at bíða, so eri eg als ikki samdir í hesum. Eg haldi ikki at eg við mínum besta vilja kann taka undir við, at nú eru allir vegirnir í Føroyum so mikið góðir, at nýgerðir tola at bíða, hóast tað ikki varð sagt allir veginir. Skal gjógvin millum Sandoynna yvirhøvur, og hinar størri oyggjarnar gerast enn størri, so skullu enn størri íløgur leggjast har, og eg vóni, at so verður. Í Sandoyar valdømi hava vit sanniliga brúk fyri, ikki bert bygda- men oyggjamenning, og samanborið við aðrar oyggjar er enn langt á mál, eg meini stórar oyggjar, og eg ætli ikki, at mín lutur skal liggja eftir at minka um hesa gjógv. Men meðan eg eri við orðið bygdamenning, sum tíverri mest eru orð, kundi eg kanska víst á eitt mál, har lit lættliga í verki kundi víst tykkara, um ikki kærleika, so kortini beinasemi, mótvegis teimum smáu og veikaru kommununum. Málið er eitt lítið mál, tá ið vit

hugsa um landið yvirhøvur. Tað er asfaltstudningurin. Eg havi altíð hildið, at mátin, sum hesin studningur verður latin eftir, er merkiligur. Hann skal eitast at verða til asfaltering av veganetum sum kommununurnar eiga at halda. Men hann verður ikki latin eftir vegalongd. Í staðin hevur løgtingi gjørt av, at luta henda studning í mun til fólkatali í teimum ávísu kommununum. Sjálvandi ger hesin studningur á henda hátt nærum ongan mun í teimum fólkafátæku kommununum við longum veganeti, meðan hann ger stóran mun í teimum fólkaríkari, hóast teir mangan hava stuttan kommunalan veg. Enn eitt dømi um hvussu nætnir tingmenn kunnu vera. Um í tí smáa, so kundi her eitt høvið verið, at gjørt bygdina nossligari, og harvið vinarligari at búgva í. Men sum sagt, hugsanin er alt ov ofta tann, at sektin liggur á teimum veiku í samfelagnum - og tí tey veiku í samfelagnum hoyra eisini tær smáu bygdirnar.

Við lóg er ásett, hvussu innihaldið í skúlanum skal siggja út, og sum kunnugt, lóg er lóg og lóg skal fylgjast. Men tað rangvørga í hesum er, at karmarnir, sum skullu rúma hesum við lóg ásettu innihaldi, eru ikki til. Men er innihaldið ásett við lóg, so skuldi tað verið eins sjálvsagt, at tað var landsins skylda at syrgt fyri at karmarnir vóru soleiðis, at undirvísingin kundi verið forsvarlig sambart lógini. Men hetta hevur tingið heldur ikki hugsað um, í hvussu so er ikki enn, eisini her er farið fram eftir fummum. Tað áligur nevniliga kommunum sjálvum, at gjalda 50% av tí, ið skúlabygging kostar, og rokna vit rentuna í byggitíðini við, verða kommunurnar lutir væl størri, tí sum er verður studningurin ikki útgoldin fyrrenn skúlabyggingin er sýnað og góðkend. Rætt er tað, at stóru og sterkaru kommunurnar byggja tíðarhóskandi skúlar, men flestar av teimum veikaru orkað hetta ikki, tí skúlabygging er sum kunnugt dýr. Einasta leið burturúr hesum er, at býtið millum landskassa og kommunurnar verður munadi broytt. Tað eigur at verða ein samfelagsskylda, at øll børn í landinum fáa somu umstøður til undirvísing. Tað verður so mangan sagt, at grundarlagið undir øllum skúlaskapi er barnaskúlin, og omaná honum byggja allir hinir skúlar-

nir, men hóast tingmenn vita, ella í hvussu so er, átti at vita hetta, so verður júst barnaskúlin viðfarin sum eitt býtisbarn.

Harra formaður!

Allar mentaðar tjóðir royna at verja um síni eykennir. Ein lítil tjóð hevur tað altíð truplari enn ein stór, tí hon er viðkvæmari fyri frammandum áringum. Grundarlagið undir tjóðini er mál og mentan. Føroyskt mál og mentan hevur tað ikki gott í dag. Tí harmar tað meg almikið, at dúgliga er skorið á skúla og mentunnar økinum og tá ið eg havi í huga, at júst tann flokkur, sum hevur sagt, at hann er skjøldur og einasta vernd fyri frælsi og tjóðskapi, umsitur hesi mál, rennur mær í hug, at ofta er langt millum orð og veruleika. Ein av okkara frægastu politikarum segði, og friður verið við hansara minni, "Í hjørtum okkara býr frælsi" og eg ivist ikki í, at hann meinti tað, hóast frælsi er so mangt, og eg kann siga tingmonnum at eisini í mínum hjarta býr frælsi. Okkara fremsta uppgáva skuldi sjálvandi verið, av øllum alvi, at vart og væla um okkara hart kroysta mál og okkara mentan, tí ein tjóð, sum hevur mist hesi serligu eykennir, er eingin tjóð.

Tá ið Karin Kjølbro, háttvirda løgtingskvinna, spurdi um uppskot um meirinntøku, skal eg millum annað geva nakrar ábendingar um inntøkur: At fyrst verður ein skattapolitikkur, sum í staðin fyri at minka um arbeiðshugin, økir um sama. At barnastyrkurin til háinntøkur verður avtikin. At rentufrádrátturin í skatti verður broyttur, soleiðis at ikki øll renta kann trekkjast frá í skattinum, men at tað verða gjørdar nøgvar reglur, hvørjar rentur ið kunnu trekkjast frá. At vinnu og virkistólini eru í slíkum standi, at til ber at framleiða fyrstaflokks vørur til útflutnings, tí at, at hækkandi fiskaprísir ikki geva meirinntøkur til kommunu og landskassan, passar jú ikki. Hægri hýrur geva meira í skatti og ikki bara tað, tað gevur jú eisini meirinntøkur til skipini og so sleppur landskassin undan at geva so stóran studning til tað útspiltu fiskivinnuna. Hetta er ein óreingjandi veruleiki. Hesi orðini eru søgd til háttvirda løgtingsmann Paula Ellefsen. Men størsta

týðningin hevur tað sjálvandi, at samgongan stýrir við skili.

Takk fyri!

Karin Kjølbro (tf.) viðmerking

Harra formaður!

Tað sum hasin seinasti æraði røðarin nevndi um at taka inn pening var jú ein programerklering, ikki hvussu vit útvega pengarnar, men eg skal venda aftur til tað.

Tá ið eg bað um loyvi til at koma við eini viðmerking til røðu hansara, so var tað hettar, at tað eru fleiri sum nú ígjár og ídag frá tingsins røðarapalli hava gjørt vart við, at fólk eru flýggja av landinum, tí her er ikki livandi. Í sístu viku var tað eisíni soleiðis, at kriminaliteturin var hækkaður so øgiligt, aftaná at henda samgongan var komin. Nú er tað smáir tríggir mánaðir síðani henda samgongan kom, so man má siga, at tað hevur sligið ógvuliga skjótt ígjøgnum, bæði við kriminalitetí og við flýggjan úr landinum. Tað er hetta seinna, eg ætlaði at spyrja seinasta æraða røðara um: Er hetta bara nakað man sleingir út, ella vita tit nakað um at fólk eru rýnd? Tey sum hava flutt nógv, tey vita, at tað er dýrt at flyta. Tað er ikki hvør sum helst, sum yvirhøður er førir fyri at flyta av landinum, so tað má verða fólk sum eru sera væl bjargað og tey hava jú altíð havt høvi til at velja. Tað er verri við teimum, sum ikki hava høvi tit at velja. Men er tað soleiðis, fólk flyta av neyð og flyta til okkara grannalond, so eiga tey pengar, tað er tað fyrsta. Tað næsta er, at sum øllum er kunnugt, so er skattatrýstið hægri í øllum grannalondum, um vit taka Danmark, Norra og Svøríki í mun til Føroyar, tað er nakað sum vit øll vita. Kann seinasti æraði røðari koma og siga um tað er nakað ítøkiligt um hetta, at fólk flyta, ella er tað bara nakað, sum verður slongt út her.

Takk fyri, harra formaður.

Heini O. Heinesen (tf.) viðmerking

Harra formaður!

Tað er ein viðmerking til undanfarna røðara. Nú tosaði hann nakað um bygdamenning, og nú blivu so nógvar sparingar á figgjarlógini, at tað var einki eftir til hesa vælsignaðu bygdamenningina. Nú veit eg ikki um bygdamenning liggur so nógv í at hava tey stóru tølini á figgjarlógini, men um vit fara at hyggja eftir tí oynni, sum hesin her tingmaðurin kemur frá, so haldi tað, at um tað er nakað sum er prioriterað høgt í hesi samgonguni og undanfarnu samgongu, so er tað Sandoyggin. Og tí haldi eg, at tað er skeivt av honum at koma ferð aftaná ferð uppá røðara pallin her. Vit byggja eina fergulegu á Gomlu Rætt, sum kostar so og so nógvar milliónir. Vit byggja havn í Skopun og vit byggja havn á Sandi. Og síðani hava vit bygt ein veldugan bátahyl í Húsavík, eg veit ikki hvat ið teir skullu brúka hann til, tað kunnu so onkrir aðrir svara uppá. Eg haldi, at hann skuldi komi upp og takka okkum fyri at vit hava verið so positivir.

Og so kemur hann inn uppá hetta her "Í hjertum okkara býr frælsi". Eg má siga akkurát sum er, at tá ið eg havi hugt at Javðarflokkinum, so havi eg aldrin tróð, at í hjørtum teirra búði frælsi, tí teir hava koyrt uppá ein sambandspolitik, sum gongur út uppá, at jú størri studning, vit fáa úr Danmark, jú betri stendur til. Men tað eru aðrir sambandsmenn, sum meina nakað annað, at tað eru Føroyingar sum hava ábyrgd av hesum landinum og tí figgjarpolitikki sum her verður rikin. Og eg veit ikki, teir eru so óðir um hesar inntøkulógir, tær kosta hvørjum mannsbarni so og so nógv, men eg havi ikki hoyrt eitt orð enn, hvar ið andstøðan hevur vist á hvar tað skal sparast. Teir hava bara víst á um at brúka meira pening. Meira pening her og meira pening der. Meira pening til mentan, meira pening til sjónleik, segði Tórbjørn Poulsen fgjár, og eg haldi tað, at hetta er tann størsti sjónleikur, tá man hevur hoyrt hetta orðaskifti her í dag og fgjár, so at tað nýtist eingin peningur til sjónleik, um vit hava tingi sitandi.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Harra formaður!

Undanfarni røðari, Jógvan Adolf, hann endaði sítt innlegg við einari heilsan til mín. Nú havi eg í nógv ár havt tað allarstørtu virðing fyri Jógvan Adolf sum menniskja og sum vinnulívsmann. Og seinni parturin av hesum innlegginum gav mær eisini respetkt fyri Jógvan Adolf sum politikkara, tí har vóru virkuliga góð hugskot. Tað sum undrar meg tað er hvussu hesin maður kann balast innanfyri Javnaðarflokkin, sum hevur stýrt hesi seinastu nógvi árini og sum hevur skapt henda tørv eftir góðum hugskotum, tað dugi eg ikki rættiliga at skilja.

Jógvan Adol Johannessen (jv.) viðmerking

Fyrst til Karin Kjølbro, sum spurði um eg kundi dokumentera, at fólk vóru flýggjað av landinum. Um Karin legði merki til hvat ið eg segði, so segði eg kanska, og tað broytir so ógvuliga nógv. Hatta orðið kanska sigur so øgiliga nógv, annars hava bløðini verið á tremur við at fólk fara av landinum.

Og so er tað mín góði vinur, løgtingsmaðurin Heini O. Heinesen, hann tosar so ofta um hesar velduga høgu upphæddirnar, sum eru lagdar í Sandoyar valdømi. Eg kann stutt siga Heina O. Heinesen tað, at tað sum higartil er lagt í havnirnar á Sandi og í Skopun er 59,2 milliónir í Skopun og um 40 milliónir á Sandi, tað vil siga umleið 100 milliónir krónir tilsamans í havnabyggin har, tað er tað sum eitt hálvt berghol, sum tað sigst nú, kostar. Og so var eitt afturat. Vit skulu minnast til, at meðan vit tosa um íløgur í Sandoynni, so eru ongar íløgur lagdar í nakra skúlabygging í Sandoynni síðani at meginskúlin varð bygdur, og hann kostaði trýggjar komma nakrar milliónir.

Eliesar Arge (ff.)

Harra formaður!

Vit mugu enn halda fast við, at tað sum er gott fyri Føroyar, er eisini gott fyri meg og teg, um vit skulu klára hetta her.

Tá og var smádrongur, tá var tað eitt undarligt fyribrigdi, og tað tykist ikki verða ørvisið í dag, jú eitt sindur ørvísi er tað, ein Bøfressur var fyrst og fremst ein Bøfressur, áðrenn hann varð Havnardrongur. Tað er eisini soleiðis, at ein Sumbingur, hann er fyrst og fremst ein Sumbingur, og so er hann Suðuroyingur og so er hann kanska Føroyingur. Og tað er allastaðni soleiðis, vit mugu leggja okkum í geyma, at vit handla út frá okkara egna nalva og so skitt við tí stóra. Áðrenn ein hevur skilt hatta har, skilir ein heldur ikki Føroyingin.

Tað var fíggjarætlanin og tað var løgmansrøðan á Ólavsøku sum er til umrøðu. Nógv arbeiði er gjørt fyri at fáa greiði á okkara fíggjar- og búskaparstøðu og hvussu vit serliga skulu útvega pening til okkara krepputhøtti fiskivinnu. Tað sær eisini úr sum tað er funnin ein gongd leið hesum málum viðvíkjandi, men leiðin er torgingin og førir nógv annað við sær. Oftani tá menn tosa, so tosa teir mest um tað sum teir ikki hava nógv við at gera til daglígt, tí tað sum teir hava við at gera, tað er ikki so stuttligt at snakka um.

Ein bólkur, sum eg serliga haldi eg hevur útlit til at koma í eina kreppustøðu, eru tey, sum fyri stuttum hava bygt hús, ella eru við at byggja. Sum vit øll vita, so hevur verið óvanliga lætt at fáa lán, og tað stór lán, bæði til líkt og ólíkt, og ikki tykist, at nakar hevur tálmað hesum. Tað gav at bíta, tá ein abbadóttir úr Israel var og ferðast her heima. Heimaftur komin til Ísraels so segði hon í skúlanum frá síni ferð her og millum annað sigur hon soleiðis, at í Føroyum har búði øll fólk í slátrum, og hon helt seg ikki gera ovnógv av. Soleiðis upplivdi hon Føroyar. Men í dag er ikki stuttligt hjá mongunm, sum skulu svara rentir og avdrátt til tíðina, um tað skuldi borist teimum soleiðis fyri, at tey forvinna minni og samsstundis eisini skula gjalda tvungna uppsparing. Tað er ikki nógv mikið at siga her, at bæði almant og privat hava føroyingar brúkt meir enn teir hava vunnið, og tað er heldur ikki nóg mikið at siga í almenna og privata húsarhaldinum, eins væl og í vinnufyritøkunum, hvat tað so enn er, má annað

skinn takast um bak. Øll fara vit at kenna farran av teim ábótum, ið gerast skullu, soleiðis stendur í løgmansrøðuni, men tað er dóg forskel uppá, hvussu vit vanlandi fara at kenna farran. Eg kundi sagt, at tey kundi havt lurtað eftir ávaringunum, og ikki bygt so dýrt, men hvussu skulu vit vænta, at tey skulu verða betri enn tað almenna og vit politikkarar, sum als ikki hava lurtað ettir ávaringum sum í áravís hava ljóðað frá kønari síðu. Vit, sum tey, hava bara dýkt á uttan at hyggja til høgru ella vinstru og nú má svíða sum svøllur og nú standa vit mitt í tí, bæði vit og tey. Avdrøg og rentur skulu rindast, og ikki bara rentur, men eisini stovningarprovisjón og árlig provisjón, og ikki tykist at tørva nakað hjá peningastovnunum og øðrum, sum teir byggja glastriborgir bæði her og der. Her má ekkurt kunna gerast, um tað stendur á hjá teimum ið hava bygt. Eg haldi at flestu vanligu skattaborgarar vilja gjalda tað meira í skatti, sum tað kostar, at húsabyggjarar kunnu draga byggirenturnar frá í skatti. Men eg haldi, at teir flestu skattaborgarar ikki hava hug til at rinda meir í skatti, fyri at spekulantar skulu kunna dusa sær. Hetta má eisini kunna broytast og tað verður tað nokk helst eisini.

Nú skal eg taka upp eitt annað evni sum eisini liggur nær nokkso nær, og sum eg havi eitt víst innlit í og tað er undir heilsumálum. Har skrivar løgmaður, at undir verðandi umstøðum verður útbyggingin av sjúkrahúsunum tálmað og útsett. Jú, eg hoyri tykkum. Nú hava býlinga- og bygdapolitikararnir norðuri í Vági, saman við tí lokalarbeiðsskapandi nevndini, sum kallar seg sjúkrahússtýrið har norðuri, næstan fingið sínar hugsanir gjøgnumførdar og tað er so væl gjørt, at teir næstan fáa drigið alt annað sjúkrahúsverk og heilsuverk eftir oyrunum, sum teir vilja. Og tað er ikki smávegis, sum hetta hevur dýrkað um sjúkrahúsverkið í Føroyum. Men til litlan fyrimuns fyri sjúklingarnar, kanska heldur tvørturímóti. Ná, eg skal ikki koma stórt meira inn á hatta har. Víðari sigur løgmaður: Eisini verður arbeitt víðari við millum annað hesum málið: uppgávibýtinum millum sjúkrahúsini. Jú, eg hoyri tykkum aftur. Tað munnu verða 10 ár

síðani ráðleggingarnevndin fyri sjúkrahúsverkið, tað føroyska sjúkrahúsverkið also, segði løgtinginum, at teir mátti fáa greiði á hesum spurninginum, nevniliga býtið millum sjúkrahúsini, tí teir mátti vita hvat ið løgtingið vildi við sjúkrahúsverkinum í Føroyum, áðrenn teir kundu koma víðari við síni ráðlegging. Tað er gjørt stórt nevndararbeiði og tá var núverandi løgmaður formaður í hesi nevndini, og so var ein maður úr hvørjum bólki, til at fáa greiði á hesum her, uttan nakað sum helst úrslit. Tað eru 10 ár síðani. Síðani er tann eina tilráðing komin og onnur eftir og seinast, tá ið Tordur var formaður í ráðleggingarnevndini, kom Dansk Sygehus Institut eisini uppí og gjørdi tilmæli. Men hví skulu vit lurta eftir teimum, vit hava ikki lurtað eftir nøkrum av hinum, so tað gera vit heldur ikki. Tað tykist sum eingin vilji hevur verið til at loysa hetta málið, men hinvegin tykist at verða ein góður og sterkur vilji til ikki at loysa málið. Og nú skulu vit arbeiða víðari við hesum málið. Nei mínir góðu æruðu løgtingsmenn, fái nú hetta málið loyst, so vit kunnu koma víðari og fáa vita hvat ið tað er vit skulu gera. Nú hevur eisini verið talan um at seta narkosulækna í Klaksvík, og verður ein settur, so má helst bæði tveir og tríggir setast, fyri at teir skulu kunna passað vaktinar har norðuri. Nei, har meini eg absolut tað hevði verið nógv meira skilabeturi at sett ein narkosulækna afturat her í Havnini. So kundi hann fari norður til Klaksvíkar ein ella tveir dagar um vikuna og ein dag suðureftir og tað hevði verið so ríkiligt. Aftaná druknivanlukkuna í Hesttirði spurdi Sosialurin meg, hví eingin var farin vestur til Kirkjubøar við tyrluni. Nú var tað soleiðis, at boðini onngantíð komu fram til okkum, og annars segði eg við Sosialin, at tað ikki var meiningin, at vaktarliðið á skurðdeildini skuldi fara av húsinum, tí teir skuldi taka ímóti, tá ið tann skaddi kom inn á sjúkrahúsið. Hatta bleiv eitt sindur, eg veit ikki, undarliga upptikið, tað var kanska eitt sindur undarliga sagt, men eg má siga soleiðis, at skal tað skipast nakað við at fara frá sjúkrahúsinum við ambulansu ella við øðrum flutningstólið, so er tað fyrst og fremst ein narkosulækna og

eina narkosusjúkrasystur tað er brúk fyri, men tá mugu tað einsini vera í hvørfall tríggir narkosulæknar, um teir skulu taka allar tær uppgávurnar upp, umframt tað sum teir hava. Annars vildi eg sagt, at tað sum treingir til í sjúkrahúsverkinum fyri at fáa skil á tí, tað er at vit mugu koma aftur til at tað er eitt sjúkrahússtýri fyri allar Føroyar, og ikki trý sjúkrahússtýri sum nú, tað her ikki til í longdini. Ein visitatiónsskipan sum er skotin upp av Dansk Sygehus Institutt hevði sikkurt eisini verið ógvuliga skilagóð. So fer løgmaður í síni talu inn á ambulatorievirksemi, og sigur at innleggingarnar verða styttri og færri, soleiðis at seingjatørvurin minkar. Jú ein funktión afturat, sum hevur meiri útreiðslur, uttan nakran bata. Innleggingarnar verða ikki styttri av tí, enn tær eru nú, tí tær eru so stuttar sum tær yvirhøður kunna verða, og tær munnu verða uppi í teimum styttstu í hvørfall í kongaríkinum Danmark. Og innleggingarnar verða heldur ikki færri, vit hava nógvar og góðar kommunulæknar, og vit hava góðar serlæknar, um tað skal verða. Hetta her er eisini helst ein misskiling, tað er einki ambulatorium, sum ger tað betri. Hetta er nógv tann bíligasta loysnin.

Nei, nú er tíðin hjá mær farin, men eg vil bara líka minna á, at Havnin er og verður miðdepulin í Føroyum, hon er eisini miðdepulin í Norðanlondunum, men ikki í verðini, tí tað er Jerusalem.

Jógvan við Keldu (ff), viðmerking.

Harra formaður!

Tað var ein lítil viðmerking til æraða røðara, Eliesar Arge, tað var í samband við, at hann kom inn uppá hetta, at tað hevði verið rætt um tað hevði verið eitt sjúkrahússtýri fyri Føroyar. Eg trúgvi at frá hansara síðu er tað sikkurt rætt, tí hetta hevði sikkurt verið tað lættasta fyri at kunna avtiki tey smærru sjúkrahúsini, um man hevði eitt sjukrahússtýri. Tað sat eitt sjúkrahússtýri frá 1939 til 51, sum fyri sovítt sat ólógligt, og tað gjørdi sín skaða, sum vit allir vita. Hinvegin haldi eg, at nú trúgvi eg ti sum stendur í

Sosialinum, millum annað sá eg stutt síðani, nú ein dagin, eitt viðtal við læknar á Landssjúkrahúsinum. Eg trúgvi, at størsta trygdin fyri einum valvirkandi sjúkrahúsverki, er ikki eitt sjúkrahús, í hvussu so er ikki, um tað koyrir soleiðis sum tað boðaði frá í tí interviewnum har, sum eg helt ljóðaði óalmindiliga óhugnaligt. Tað rætta má verða tað, at tú hevur og útbyggir hesi trý sjúkrahúsini, soleiðis at tú fært trygdina fyri sjúklingin. Tað er absolut tað týdningarmesta. Og nú nevndi Eliesar Arge eisini um at ein narkosulækni verður settur í Klaksvík, heldur enn at lata hann ferð ast norður og verða ansettan í Havn. Hetta er heldur ikki rætt, tí vit vita, at samstarvið millum sjúkrahúsini tað gongur ikki, tí at Landssjúkrahúsið stillar seg uppá bakbeinini og tað havi eg somikið nógv prógv fyri. Hetta her er dreymatala, og at Havnin er miðdepulin, tað verður hon soleingi, sum bygdirnar kunnu spræna framleiðslupening inn í Havnina, og tað gongur ikki longur heldur.

Karin Kjølbro (tf.) viðmerking

Harra formaður!

Mær tókti, at tað var rættliga vælgerandi, at seinasti ræðari, Eliesar Arge, tók eitt reelt mál burturúr tí búskaparliga hópinum, nemliga hetta við sjúkrahúsverkinum. Har kundi verið áhugavert at tikið eitt stórt kjak, vit hava havt so mong, og tað skal ikki liggja millum Klaksvík og Havnina. Tað sum nevnt var, var at ambulatoriuvirksemið ikki kemur at minka um innleggingartalið, ella at stytta um innleggingarnar, ella fyribyrgja innlegging, tí at kommunulæknarnir skuldi yvirtaka tað.

Harra formaður!

Mín spurningur skal tí verða til Eliesar Arge, vil tað so siga, at hetta við ambulatoriuvirksemi, og møguleika fyri at konsultera ein serlækna, er "skønne spilte kræfter", um eg so má siga, vit skulu als ikki hava tað, vil tað siga tað, aftaná at hatta er so nógv umrøtt í øllum, hvat skal man siga, kalkylum viðvíkjandi út-

bygging av sjúkrahúsverkinum, hvussu tað skal verða, tí vit vita at tað er so ómetaliga dýrt at hava sjúkrahúsverkið koyrandi. Tá vit so harumframt hugsa um, hvussu høg hygiejnan er, hvussu góð okkara hús eru, so skuldi tað ikki verið neyðugt at veri so nógv innlagd, sum vit vanliga verða. Tað er at gleðast yvir, um so er, at vit hava styttstu innlegging í kongarikinum, ella í Skandinavia. Men aftur til hin spurningin, er ambulatoriuvirksemi púra óneyðutt, takk.

Eliesar Arge (ff.) viðmerking

Harra formaður!

Tað var líka eitt aftursvar til Jógvan við Keldu. Tá ið man hoyrdi hann tosa í gjárkvøldið um hvussu vit skuldi skera tað almenna niður og tær almenu veitingarnar, og vit skuldi minka um kontórhaldið og slíkt. At fara at byggja trý javnbjóðis sjúkrahús í Føroyum, tað er í hvørt fall ein fantastiska dýrur postur. Og tað er púra óneyðugt, og tað gevur onga betri servise til sjúklingarnar, eg veit ikki hvønn tað er betri fyri, men ikki fyri sjúklingarnar, tað er tað ikki. Viðvíkjandi ambulantoriuvirksemi vildi eg nokk sagt, at ambulaturium í gynokologi og obstretik er nokk uppá sítt pláss. Men annars er tað bara nakað sum vit vanliga yvirtaka frá øðrum londum, sum vit líka avskriva lógir og soleiðis er tað. So ein ting "wie so müssen wir auch haben", vit mugu jú eisini hava eitt ambulatorium, tað hava tey jú aðrastaðni og tað gevur einki meira og tað er fantastiskt dýrt og tað verður ikki drivið hvørki so rationelt ella gott sum um vit hava eina væl útviklaða primera læknatænastu nú, sum ger tað nógv betri. Eg veit ikki um hatta var svar nokk, tí nú sleppi eg ikki at siga meir.

Tórbjørn Poulsen (sj.)

Harri formaður !

Eg skal í míni aðru røðu koma eitt sindur inn á teir spurningar, sum hava verið reistir í umrøðuni av

løgmansrøðuni og fíggjarlógini higartil.

Tað verður ført fram av samgongumonnum, at tann tvungna uppsparingin, sum tikin verður frá fólki ár, verður fingin teimum aftur í 1992. Hetta er ikki beint, harri formaður. Pauli Ellefsen hevur skrivað hetta í Dimmalætting, og tók tað uppaftur her í gjár. Eilif Samuelsen segði tað sama, men tað verður ikki rættari av teirri orsøk. Sambart lógina um bundna uppsparing, sum lýst er í kunngerðablaðnum og útgivið 7. juli í ár, skal uppsparingin fyri 1989 í seinasta lagi í juli 1992 verða sett inn á eina bundna konto og verður peningurin útgoldin eigaranum í fyrsta langi tá hann fyllur 65 ár, ella við deyða ella gjaldstrot, tað er tá hann fer á húsagang. Hjá ti unga ættarliðnum kann tað verða líka mikið um tað eitur skattur ella tvungin uppsparing, sum tey fáa aftur, tá ið tey verða 65, og enn minni aftaná at tey eru farin av verðini. Ein uggi er tað sjálvandi, at tey fáa peningin aftur, tá ið tey eru farin á húsagang. Er tað ikki komið hesum samgongumonnum til hugs, at tey sum sita í nýggjum húsum, tey frenja eina uppsparing, sum er teimum ivaleysa stór, teimum er ikki størri uppsparing fyri neyðini, og allarminst ein tvungin uppsparing, sum møguliga kann reka tey úr húsinum.

Essa Arge nýtti stóran part av fyrri talitíð sini at greiða okkum frá einum dreymi hann hevði havt meðan hann var staddur í Jerusalem, sum vit fáa at vita er miðdepul í verðini. Hetta var mikið áhugavert, sjálvt um eg ikki rættiliga fekk við hvat dreymur hansara hevði við løgmansrøðuna og fíggjarlógina at gera. Eg hevði nógv heldur vilja hoyrt meira um tá ið hann tosaði um, í seinni røðu sínu, um tann velduga niðurskurð, sum er innanfyri heilsuverkið. Sambart fíggjarlógaruppskotið skullu takast útvið 37 miliónir krónir av játtanini bara til Landssjúkrahúsið í mun til í ár og svarar hetta uppá eina niðurskuð uppá 15%. Hvat hendur, tá ið psykiatriska deild 4 verður stongd. Hvørja ávirkan fær tað á røktina, at prosmatisku deildirnar verða heilt ella partvíst stongdar, partar av árinum, og aðrar alt summarið. Kann tað ikki fáa óhepnar avleiðingar, at ambulansutænastan í Eysturoynni verður niðurløgd. Hvat

merkir tað, at skaðastovan á Landssjúkrahúsinum verður lukkað skaðastova? Hetta eru spurningar, sum eg kundi hugsað mær at fingi at vita, um ikki annað frá Essa Arge, so kanska, harra formaður, frá landsstýrismanninum í heilsumálum, harn er kanska tann rættari, sum eigur at svara uppá slíkar spurningar sum hesar.

Í 1982, tá ið eg sat í landsstýrinum við ábyrgd fyri fíggjar- og skattamálum og Eilif Samuelsen við ábyrgd fyri almannamálum, setti løgtingskvinnan Karin Kjølbro okkum ein spurning. Hon vildi hava okkum at definera tað hon kallaði "hungursmarkið". Orsøkin til fyrispurningarnar var, at samgongan, sum hon sjálv hevði verið limur av tvey ár frammanundan, hevði framt ta broyting í skattalóguni, at skattavaldinum skuldi verða loyvt, tá talan var um eftirsløðu, at afturhalda upp til 50% í lønini fyri skatt. Tingmenn hoyrdu rætt, 50% av lønini fyri skatt. Síðani tá hevur løgtingskvinnan, Karin Kjølbro, verið við til at hækka tollgjøldini, ikki einaferð, men fleiri ferðir. Hon hevur verið við til at áleggja eitt oljugjald, og síðst, men ikki minst, hon var við til at samtykja bundnu uppsparingina. Tá Karin Kjølbro setti mær spurningin um hungursmarkið, tá var eg í samgongu og hon í andstøðu. Nú er tað mín túrir at spyrja: Hvar metir Karin Kjølbro hungursmarkið at liggja? Nú er ikki talan um 50%, nú eru nógv hægri prosenthæddir, sum verða tiknar av frá lønmóttakaranum. Hvat skulu fólk gera, tá tey eru komin har til, at tey skulu velja imillum, at fáa mat í munnin, ella fara úr húsi og heimi.

Karin Kjølbro man hava lurtað ógvuliga illa eftir igjár. Hon segði, at eingin í tí 6 tíma langa orðaskiftinum hevði sagt nakað um alternativar inntøkumøguleikar. Eg nýtti stóran part av talitíð mini til at at vísa á eina røð av møguleikum, sum átti at verði troyttir, áðenn farið varð út til Palleba og Marsonnu, sum Karin Kjølbro málbar seg. Eg kann gott endurtaka tað eina aðruferð um tað er ynskiligt. Flest allar útreiðslukontioir á fíggjarløgtingslógaruppskotinum eru lækkaðar í mun til upphæddirnar í 1989, undantikið, sjálvandi, stuðulin til fiskivinnuna, sum er munandi hækkaður. Men

tað er eisini ein onnur konto, sum er farin nógv upp, og tað er kontoin fyri bíðipening landstýris og løgtingsmanna. Roknskaparárið í 1988 vórðu á hesi konto nýttar 1.655.000 krónur, nú verður mælt til at seta hesa upphædd til 2.660.000 krónur til bíðipening landstýris- og løgtingsmanna, ella ein vøkstur uppá 60% eftir tveimum árum. Hetta eru piparnøtir, hetta týðir einki, hetta er lítilsvert og ger ikki spor mun, siga samgongumenn, og onkur hevur kanska hug til at smírast. Tað kann væl verða, men í hesum tíðum, tá tað verður kraft av øðrum í samfelagnum, at tey skulu halda aftur við lønarkrøvum, samsturdis sum teimum verður álagdar tyngjandi avgjaldsbyrðar, og uppaftur fleiri eru fráboðaðar. So er tað ósømiligt, at tingmenn skulu veita hvør øðrum eykasømdir. Upphæddin til bíðipening landstýris- og løgtingsmanna, sum hon er sett at verða, svarar til einar 18 hampuligar verkamannalønir, og tað hevði komið væl við hjá mongum, nú tað ferð at sansa at. Hergeir Nielsen kastaði nær fyri, at bíðipeningur landstýris- og løgtingsmanna var nakað, ið eg hevði funnið uppá, meðan eg var landsstýrismaður. Hetta er ikki beint. Løgtingslógirnar, tær eru tvær, um bíðipening løgtings- og landsstýrimanna eru frá 1971, hesar vórðu broyttar í 1984. Sambart eitt uppskot frá Páll Vang, sum hann legði fram, her í tinginum, vórðu vissar ajourføringar gjørdar av hesum bíðipeningi. Men sjálvt um eg hevði verið við til at gjørt hesa lóggávu, so hevði eg ikki smæðst fyri at broytt tær, ella tikið tær av, um eg meinti tað var sømuligt, og tað meini eg í hesum føri at tær eru.

Eilif Samuelsen var ikki sørt ósmæðin, tá hann helt fyri, at teir smáa flokkarnir á tingi høvdu verið samfelagnum dýrir. Hann kom tó ikki nærri inn uppá hvat hann meinti við hesum. Var hetta tøkkin fyri áralanga samvinnu millum Sambandsflokkin og Sjálvstýrisflokkin, ella var hetta eitt farvæl til teir smáu flokkarnir. Kenna Sambandsmenn seg so væl í teirri nýggju samveru við Tjóðveldisflokkin at teir meta ikki verður brúk fyri teimum smáa flokkunum longur. Eg fari ikki at leggja meg út í, hvat aðrir flokkar hava avrikað her á ting ella ligið samfelagnum til læst, men mangt hevði verið ør-

visið, til tað verra, um Sjálvstýrisflokkurin ikki var. Í tey 41 árini, síðani vit fingu heimastýrislógina, harra formaður, hevur Sjálvstýrisflokkurin verið í samgongu í 30 ár, og nógv av teimum saman við Sambandsflokkinum.

Takk fyri.

Løgmaður, viðmerking

Harra formaður!

Nú er Olaf Olsen, landsstýrismaður, ikki til staðar her, men hann kemur aftur, og hann skal nokk svarða Tórbjørn Poulsen uppá spurningin um sjúkrahúsmálið, men eg kann bara líka her beinanvegin siga frá, at hann hevur havt nógvar fundir, bæði við Sjúkrahússtjóran, við læknaráðið úti á Landssjúkrahúsinum, við partar av sjúkrahússtýrinum og við administratiónina og tað er semja um at tað væl ber til at gera teir niðurskurðir, sum eru settir á fíggjarlógina viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum, og tað kann fungera væl við teimum niðurskurðunum. Forútsetningurin er bara tann, at man innanfyri sjúkrahúsverkið, sjúkrahúsadmínístratiónina, sleppur at hava eitt orð at siga um hvussu tað skal skipast fyri og at hetta her ikki bara verður stýrt av, orðsakað úttrikkið, tilvildarligum politikarum.

Karin Kjølbro, (Tf.) viðmerking

Harra formaður!

Tað var eisini til seinasta ærað røðara. Er tað verulíga soleiðis, at hann hevur staðið og tveitt gullkorn her ígjár sum eg havi verið ov tornom at fanga, so fari eg ikki at biðja hann um at endurtaka tey her, men eg fari inniliga at biðja hann um at koma við hesum gullkornunum í Krossi, so vit kunnu lesa tey og eg skal lova honum, at tey verða viðgjørd við størsti virðing.

Hitt er hungursmarkið. Ja vist minnist eg fyrispurningin um hungursmarkið. Eg var ikki í iva um hvar hungursmarkið er, harra formaður. Hungursmarkið hevur altið í mínari verð verið tann upphæddin sum verður

givin í forsorgarhjálp til eina og hvørja tíð í einum landi. Forsorgarhjálpin er stórt sæð tað sum fólkapensjónin er. Tað sum hendi í 1982, tað var teirra ótrúliga gramheit í móti teimum minstu í samfelagnum, í samband við skattaeftirstøður, hvar tað var gjørligt at krevja inn 65% sum hámarkið, av tí sum fólk høvdu tjent. Hetta var aldeilis katastrofalt fyri fólk, ið vórðu givin við at arbeiða, og sum so vórðu vorðin fólkapensionistar. Tað vóru tey fólkini sum vóru komin í klemmu, og tí reisti eg tann spurningin um, hvar ið hungursmarkið lá hjá táverandi samgongu. Í mínum hugaheimi er heilt greitt hvar ið hungursmarkið er. Er tað soleiðis, at tað framvegis eru fólk, ið skulu líva undir tað upphædd ið veitt verður eftir forsorgarlógini, so fara vit eisini at tala at í hesi samgonguni, og vit hava nýliga fingið at vita, hvat upphæddin er. Tað kann ikki verða soleiðis, at tú við at arbeiða hevur minnið eftir, enn um tú fert niðan á Almannastovuna, og tað hugsi eg eisini, at henda samgongan vil fyribyrgja fyri ein hvønn pris.

Heini O. Heinesen (tf.), viðmerking

Harra Formaður!

Nú er tað so ógvuliga populert at tosa um bíðipening løgtingsmanna, og eg haldi tað, at tað er ikki neyðugt at hava bíðipening til menn, sum eru fullførir, tá teir fara útaftur úr Løgtinginum, tað er mín persónliga meining um hatta har. Men tað sum eg ætlaði at spyrja Tórbjørn Poulsen um, nú veit eg, at hann er alment løntur, hann arbeiðir á Telefonverkinum, eg vil gjarna fáa at vita um hann og aðrir, sum arbeiða her í Havnini til dømis, fáa teir fulla løn í sínum starvi, meðan teir arbeiða í løgtinginum, tað haldi eg hevur nógv meiri týdning í samanhanginum, enn hesin vælsignaði bíðipeningur. Tí vit vita, at sjómanskúlalærarar og tekniskir skúlastjórar og aðrir, teir hava arbeitt her í løgtinginum, hava teir fingið fulla løn við hús eisini, tað er tað sum eg vil spyrja um, tí eg verði, ikki av navngivnum persóni, eg veit ikki um tað er Lassi Klein sjálvur, sum skrivar hesar her greinarnar um mitt virk-

seni, eg arbeiði hjá einum stovni, hvar eg skal hava fingið so og so nógva løn. Eg vil gjarna hava at vita, um hesir monnirnir hava fingið fulla løn meðan teir hava arbeitt her í løgtingjnum. Hatta hevur nógv størri týdning, enn bíðipeningurin, skrivi tykkum tað aftanfyri oyra, óansæð hvar ið tit arbeiða, innanfyri tryggingina ella telefonverkið ella innanfyri tekniskar skúlar ella annað. Eg haldi, at tit skuldi komi upp og tosa um hatta har, og koma veruliga til kjarnina í málinum, teir sum fáa tvær og triggjar og fýra lønir.

Eliesar Arge, (tf.), viðmerking

Harra formaður!

Tað vóru nakrir fáir spurningar, sum vórðu settir mær. Dreymurin, eg brúkti kanska nakað av tíð uppá tað, var fyri at vísa hvussu tað var, at føla seg hildnan fyri gjøldur. Ein lukkað skaðastova, tað hevur tað altíð verið har úti á hospitalinum, og meiningin er tann, at um man hevur fingið smáskaðar, so kann man koma har, um tað er hent innanfyri teir seinastu 24 tímarnar. Tað skuldi verið so ríkiligt um man kundi fari til sín egna lækna tá. Annars verður tað gjørdar læknamiðstøðir bæði her og der, og tær verða nokk so væl útstýrdar og tær eru útmerkað egnaðar til at orðna teir smáskaðar, sum oftani koma á skaðastovuna. Ambulansutænastan í Eysturoynni haldi eg sjálvir er ov dýr, tað kann gott verða, at tað skal verða undir einum ella øðrum formi, teir hava lítið at gera, tað er stór maning á teimum, og tað er alt for dýrt, tað sum er í løtuni, vildi eg hildi, til ta nyttu man fær burtur úr tí. Niðurskurðin skal eg ikki koma so nógv inn uppá, tí tað sum varð boðað frá av løgmanni, tað hevur Olaf Olsen karmað og hann kann nokk siga frá tí. Annars havi eg ongantið sagt, at tað bara skal verða eitt sjúkrahús í Føroyum, men eg kundi ynskt mær, at tað bleiv eitt, sum kundi fungera soleiðis so nøkunlunda sum eitt sentralsjúkrahús, og tað var møguleiki fyri tí, og ikki, sum tað er sagt, at vit skulu brúka ríkishospitalið sum sentralsjúkrahús. Uppgávan hjá hospitalinum, tað er ikki bara at viðgera sjúklingar,

men tað er eisini at undirvísa og at granska og tað verður eingin møguleiki til tað, sum tað er í løtuni.

Jógvan Durhuus, (tf.), viðmerking

Harri formaður!

Eg kann taka undir við hasum fyrispurninginum sum Heini O. Heinesen setti fram her til teir tingmenn, sum annars eru úr Havnini. Sum bygdamaður eri eg eisini alment løntur, men eg rokni við, at allir bygdamenn sum eru alment løntir, tá ið teir fara til Havnar í tingarbeiði, so fáa teir ikki løn heima, tí kundi tað verið ógvuliga áhugavert at vita um teir sum eru alment løntir og búgva í Havn virkuliga fáa pening fyri at síta í tinginum, í tveimum støðum í senn. Bitt afturat. Tá ið Tórbjørn Poulsen, háttvirdi tingmaður sjálvstýrisflokksins, nevnir at hann sum landsstýrismaður sat í 1984, tá ið broytingin fór fram viðvíkjandi bíðipeningi, at hann lat tað fara framvið uttan nakað víðari. Hetta var jú ein lóg frá 1971, ella í 70inum, so dugi eg ikki at skilja, at tá Sjálvstýrisflokkurin í dag hevur so nógv ímóti hesum bíðipeningi, sum kanska er skeivur, at man ikki tá langaði nevan í borðið. Tá sat hann á landskassanum og Sjálvstýrisflokkurin hevur ikki fram til dagin í dag komið fram við nøkrum uppskotum um hesa broytingina, men Sjálvstýrisflokkurin sat á kassanum tá ið broytingin fór fram.

Lasse Klein, (sj.), viðmerking

Harra formaður!

Tað hevur samband við tað sum Tórbjørn Poulsen var inni á, og sum eisini Essa Arge endurtók. Hann segði tað, at tað hevði verið lítið brúk fyri ambulansuni í Eysturoynni, og har hugsi eg, at hann ferð skeivur, tí tað hava í hesum tíðarskeiði higar til í ár, hon er stutt síðani upprættað, har hava verið 164 koyringar. Har hava verið 25 útrykningar og 33 hastitúrar og tað er komið mær fyri oyra, at mannalív hava verið spard, orsakað av at henda ambulansan hevur havt støð í Eystur-

eymni, og tað ætla lit eftir øllum at døma at taka burtur. Eg vil minna tykkum á, at upphæddin, sum er sett av til Landssjúkrahúsið, hon er treytað av nøkrum heilt ávisum konkretum tingum. Hon er treytað av tí, at tá ið tit samtykja fíggjarlógina í samband við Landssjúkrahúsið, so siga tit automatiskt, í hvussu so er 10 - 15 fólk úr starvið. Tað stendur beinleiðis í viðmerkingunum, at tað er treytaðø av hasum.

Og í samband við Heini O. Heinesen so verið eg noyddur til at rættleiða hann. At skuldseta meg her frá løgtingsins røðarapallið at skriva dulnevnd lesarabrøv, tað krevur ein frekleika uttan líka. Eg kann upplýsa Heini O. Heinesen, at Lasse Klein fær 0 aðra løn enn tingmannalønina meðan hann er, og eg kann taka sum dømi, at meðan eg sjálvir var limir í landsskúlaráðnum, tá fingu teir, sum vóru lærarar har, teir fingu fulla løn meðan teir vóru har, teir fingu frían vikar, meðan eg og aðrir, sum komu frá fríu vinnuni fingu 0 krónir. Tað gav arbeiðsmanninum, manninum frá fríu vinnuni nul møgleikar yvirhøvur at luttaka í almennum nevndararbeiði.

Tórbjørn Poulsen (sj.) viðmerking

Harra formaður!

Nú gav mítt innlegg grund til eina røð av viðmerkingum, og fyrispurningum, og tað sigur mær so mikið, at eg trakkaði kanska onkran á tærnar. Tað ger ikki spor, um hetta her kann føra til, at vit fáa konstruktivt uppskot á ting sum kann føra til, at vit fáa skil á hesum her við bíðipeningi og ikki minst tingmannalønum og teimum sum eru alment løntir og so framvegis, og Heini O. Heinesen og Jógvan Durhuus skulu ikki koma upp og siga her, at teir ikki vita tað, at teir allarflestu her í tingsalinum eru bæði dubult og kanska trýdubult løntir.

Karin Kjølbro vildi verða við, at hon saknaði alternativ uppskot, og at eg skuldi fara at koma við hesum í Tingakrossi, uppskot um inntøkur og so framvegis. Eg skal ikki bara koma við teimum í Tingakrossi, eg skal eisini koma við teimum her í tinginum, so vóni

eg, at hon fer at taka undir við tá ið tey koma fram. Karin Kjølbro nevndi eisini hetta her við 65%. Eg haldi, at hon mistekur seg. Tá ið hetta fór fram við fyrispurningi um hungursmarkið, tá varð talan um at taka upp til 50%. 65% kom ikki fyrrenn í samtíðarskattaskipanini, tað var samsart samtíðarskattalógina loyvt at taka 65%, tað var tað ikki talan um í 1982, tá ið hon setti okkum spurningin. Tá var talan um at taka upp til 50%.

Takk fyri.

Formaðurin

Tað verður døgurðastøgur nú, so fundurin verður niðurlagur. Hann verður uppafturtikin kl. 14°°.

(Klokkan er 12¹⁵)

Mikudagin 20. september 1989, kl. 14°°, fundurin uppafturtikin.

Signar Hansen, landsstýrismaður

Harra formaður!

Vanliga er tað soleiðis, at tá ið løgmansrøðan og fíggjarlógin verða viðgjørd, so eru menn ójavnir á máli. Teir, ið sita í andstøðu finnast at, meðan teir ið mynda samgonguna taka í høvuðsheitum undir við tí, ið landsstýrið ber fram. Hesaferð hava vit so bæði hesi stórmál til viðgerðar samstundis - og tað ið ein leggur til merkis er, at andstøðumenn umrøða meira løgmansrøðuna enn sjálva fíggjarlógina, og orðaskiftið er spakari enn tað vanliga plagar at verða.

Eg hugsi at orsøkin til at so er, er tann einfalda, at allir flokkar á tingi ásanna, at tung tøk mugu takast til at fáa figgjar- og búskaparstøðuna betri í landi okkara. Tó tykist tað mær sum ein tingmaður skilir seg frá hinum í andstøðuni, og tað er háttvirdi tingmaðurin og leiðari Javnaðarfloksins Atli Dam. Hann finst rættiliga harðliga at fíggjarlógaruppskotinum. Sama er at siga um málgagn Javnaðarfloksins - allar tær sparingar á fíggjarlógaruppskotinum, ið sitandi samgonga mælir

til, verða rakkaðar niður í sand og øsku. Satt at siga, hevði eg ikki væntað at so fór at verða, tí allir flokkar vita, at álvarslig tiltøk mugu setast í verk, skulu vit hava eina fíggjarlóg, sum í minsta lagi javnvegar.

Neyvan nakað annað ár, eru fíggjarmál og búskaparmál so nógv umtalaði av tingflokkum, sum júst í ár. Tá ið samráðingar hava verið um at skipa landsstýri - og tær hava verið nógvar - so eru allir flokkar á tingi, ið hava lagt fram samráðingarupplegg til at skipa landsstýrissamgongu. Millum hesar er Javnaðarflokkurin. Hann hevði millum annað hetta uppskot, at yvirskotið á fíggjarlógini uppá 300 milliónir skuldi fremjast við at minka um almennu útreiðslurnar. Minkað verður serliga um íløgurnar, ið verða toygdar yvir longri áramál ella útsettar. Neyðug stýring verður gjørd viðvíkjandi samferðsluíløgum. Hesi brot tikir mær at verða skilagóð og er tað júst hetta ið sitandi samgonga hevur boðað frá í løgmansrøðuni og sum verður skotið upp í framlagda fíggjarlógaruppskoti. Bert tann stóri munur, at vit ikki hava tikið so rivan til, sum Javnaðarflokkurin mælti í uppleggi sínum fyri nøkrum fáum mánaðum síðani. Tað verður sera áhugavert at síggja hvørjar sparingar Javnaðarflokkurin ætlar sær at seta í verk. Í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina hava teir ikki víst á nakra gongda leið, men møguliga verður komið við onkrum undir viðgerðini í sjálvari fíggjarnevdini.

Tað er annars skemtuligt at hoyra Atli Dam, háttvirda tingmann, finnast at Tjóðveldisflokkinum, at hann er farin at samarbeiða við Fólkaflokkin, ið hann sigur liggja so langt úti á høgra veingi. Frá 1974 til 1980 samarbeiddu Javnaðarflokkurin við Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin. Samstarvið gekkst rættliga væl, í øllum førum samstarvaðist Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin fram úr væl. Var kuril onkuntíð á, so vóru tað alloftast Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin, ið stóðu saman í móti Tjóðveldisflokkinum.

Innan samgonguna eru tað einstakir tingmenn, ið finnast at framlagda uppskotinum, og tað hava teir sjálvandi fullan rætt til. Men tá ið eg hoyrdi Pauli Ellefsen, formann Sambandsflokksins, fall mangt mær fyri

brósti, ið hann hevði at bera fram. Hann fannst at, at alt ovlítið varð skorið niður av fíggjarlógaruppskotinum, hann kendi ikki uppskotið, eingin samgongufundur hevði verið og so framvegis. Løgin tala, tá júst hesin flokkur umsitur fíggjarmál. Pauli kundi so í minsta lagi vent sær til sínar egnu landsstýrismenn og spurt teir um hvørja ætlan landsstýri hevði við hesum uppskotið um nýggja fíggjarlóg.

Anfinn Kallsberg helt fyri, at framlagda uppskot var eitt megnaðar verk og tað fór at verða trupult hjá fíggjarnevndini at skera meira niður enn gjørt var av landsstýrinum. Um tað er rakað megnarverk, skal eg lata aðrar døma um, men eg tori at siga, at landsstýri hevur gjørt sær ómak. Hevur hildið fund við teir nógvu stovnarnar, ið verða raktir av niðurskurðinum, og flestu teirra heva sagt at teir skulu klára sínar skyldur innanfyri tær upphæddir, ið eru settar á hettar fíggjarlógaruppskot.

Tá ið landsstýrissamráðingar fóru fram, vórðu tað menn, har ímillum Pauli Ellefsen, ið kravdi, at ein fíggjarlóg varð gjørd beinanvegin við stórum niðurskurðum og uttan at málið fekk nakra nágreiniliga viðgerð. Vit í Tjóðveldisflokkinum boðaði longu tá frá, at vit vóru fúsir til at fremja skerjingar, men at tað skuldi gerast við skili. Eg vóni, at hetta verður gjørt, og eg heiti á fíggjarnevndina, sum fær hetta mál til viðgerðar, at hon hevur hetta her í huga, at um teir ætla at spara meiri og fremja aðrar størri sparingar, at tað verður gjørt við skili, at vit kunnu liva við tí.

Viðvíkjandi inntøkutølunum í hesum uppskoti er at siga, at tað er sera torført at meta um hesi tøl, tí ilt er at siga hvussu tey tiltøk vit seta í verk koma at ávirka inntøkutøl landskassans. Landsstýrið hevur tó gjørt sær ómak við hesari meting og vóna vit, at hesi tøl koma at halda so nøkunlunda.

Flest øll útreiðslutøl á fíggjarlógini eru lækkaði, tó er einstakt tal hækkað. Millum annað upphæddin til okkara fiskivinnu, ið nú er komin uppá 454 mió. kr. Hóast vit í Tjóðveldisflokkinum hava tikið undir við hesum, tí fiskivinnan hevur brúk fyri hesum peningi nú,

so meina vit framvegis, at henda upphæddin eigur at verða minkað munandi á figgjarlógini framyvir, og at skipað verður soleiðis fyri, at meira fæst fyri okkara fiskavørur. Væl vita vit, at í samgonguskjalinum standur, at broytingar skulla gerast ið bera á tað rætta borið. Millum annað skal øll stuðulslóggáavan endurskoðast, vrakarastovnurin skal umskipast, uppboðssøla verður at skipa og so framvegis. Men vit meina, at líknandi setningar hava nú staðið í so mongum samgonguskjølum hesi seinasti árini, men úrslitini tey hava verið alt ov soltin. Nú er nógv mikið talað og nógv mikið skrivað um hesi viðurskifti, tiðin er komin til tað, at vit skapa nakað og seta nakað í verk, soleiðis at vit fáa vend í á hesum økið.

Harra formaður!

Eg fari annars at nema við nøkur av teimum málsøkjum, ið eg umsiti úti í landsstýrinum. Eitt av hesum eru skúlamálini. Hóast vit leggja allstóran dent á, at sparsemi verður sýnt á hesum økið, so er ikki ætlanin harvið, at framburðurin skal støðgast. Eg kann soleiðis nevna, at maskinskúlin, sum nú í mong ár hevur húsast undir sera vánaligum korum, fær heilt aðrar umstøður. Arbeitt verður við projektið um nýggjan skúla og ætlanin er at fara undir sjálva byggingina fyrst í 1991 og roknað verður við, at hendan byggingin tekur umleið 2 ár.

Umstøður HF- og studentaskúlan í Eysturoy hava somuleiðis verið út av lagi vánaligar og striltið hevur gingið at fingið avgreitt hetta álvarsmál. Sitandi samgonga hevur avgjørt, at nógv umtalaða sambyggingin við Handilsskúlan í Eysturoy verður framd. Við hesi bygging verður talan um eina sparing uppá umleið 15 mió. kr., somuleiðis verður mett, at rakstrarútreiðslurnar lækka við eini hálvari til heilari millión um árið við hesari sambygging, samstundis sum hildið verður at nógvir undirvísingarligir fyrimunir eru at heinta her. Í grannalondum okkara eru fleiri royndir við at samanleggja slíkar skúlar og royndir teirra hava verið sera góðar.

Fiskivinnuútbúgving er byrjað í Vestmanna og

sýnist at verða stórur áhugi fyri henni.

Løgmaður nevnir sjóvinnuútbúgvingina, ið landsstýrið arbeiðir við. Enn eru vit ikki komnir á mál, men vænti eg hetta mál verður loyst einaferð í heyst, og at skúlin kann byrja virksemi sítt í leigaðum hølum fyribils í 1990.

Umstøðurnar hjá tekniska skúla í Klaksvík eru munandi betri nú, nú bygt er afturat har norðuri.

Nýggji handilsskúlin á Kambsdali verður liðugur einaferð fyrst í komandi ári, soleiðis at næmingarnir fáa heilt aðrar umstøður at virka undir. Orsøkin til, at upphæddin til handilsskúlan er hækkað nakað, er hon, at hesin nýggi skúlin byrjar virksemi sítt í 1990. Annars er at siga, at leiðslurnar fyri teir einstøku skúlarnar hava víst vilja til at fylgja uppskotum landsstýrisins um at sýna sparsemi í rakstrinum.

Síðani hetta fíggjarlógaruppskot varð lagt fram á tingborð er rættuliga nógv gjørt burtur úr ávísum sparingum í uppskotinum á skúlaøkinum. Á skúlaøkinum er nógv gjørt burturúr tí í gásaeygum "velduga niðurskurðinum, ið gjørdir er við sjálvan fólkaskúlan". Tíverri verða rong tíðindi borin um hesa sparing. Aftur her er tað Javnaðarflokkurin ið gongur á odda. Umboð floksins og blað floksins hava misskilt tað ið stendur á fíggjarlógaruppskotinum, av tí einfaldu orsøk, at teir ikki hava hugt nógv væl at hesum tølum, ið standa í fíggjarlógaruppskotinum. Javnaðarflokkurin hevur ferð eftir ferð borið fram, at talan er um at spara umleið 14 mió. kr., og at eini 90 lærarar tí gerast arbeiðsleysir. Hesir villleiðandi upplýsingar eru farnir víðari, ja standa enntá í útlendskum bløðum í dag. Tað er ferð eftir ferð gjørt vart við hesa villleiðandi skriving og talu, bæði við Atla Dam sjálvan, formann Javnaðarfloksins, og við málgagn Javnaðarfloksins, Sosialin, men tað er so eigasørt at tað rínir við, tað er sum at sletta vatn á gás. Sannleikin er tann, at her er talan um eina sparing uppá umleið 4 mió. kr. og ikki tær 14 og skúlatyrisitingin, saman við landsstýrinum, arbeiðir við at finna útvegir, hvussuleiðis vit kunnu rationalisera soleiðis, at vit sleppa undan at siga fólk upp innan

skúlaverki.

Á skúlakontoini, grein 14, har stendur grunnurin til útbúgving og er hann lækkaður úr 45 mió. kr. niður í tær 40 miliónirnar. Lógin er gjørd á tann hátt, at meginparturin av teimum játtanunum, ið stuðulsstovnurin kann veita, er lógarbundið, og tí verður neyðugt at leggja málið fyri tingið. Landsstýrið arbeiðir í løtuni við hesum máli og hevur kannað eftir hvørjar skipanir grannalond okkara hava, og hvussu stórir stuðul verður veittur í hesum londum, sammet við okkara. Alt bendir á, at okkara fólk undir útbúgving eru rættuliga væl fyri hvat stuðuli viðvíkur, sammett við grannalondini. Landsstýri meinar, at henda upphædd, ið hevur staðið á figgjarlógini tolir at verða lækkað, soleiðis at eisini hesi taka part av tí niðurskurði, ið verður gjørdir í landshúsarhaldinum. Stuðulslóggávan sum er í gildi, veitir bert stuðul til teir, ið fáa sær útbúgving her heima ella í Norðurlondum, men tá ið talan er um onnur lond, so verður stuðul ikki veittir. Mong eru tey, ið hava áhuga ið at leita sær aðrar vegir at fáa sær útbúgving, men setast aftur, tí eingin stuðul er at heinta. Fleri hava vent sær til landsstýri við áheitan um at leggja soleiðis til rættis, at tey fáa sama møguleika, sum tey sum lesa í Norðanlondum og í Føroyum. Landsstýrið setti tí fyri nøkrum mánaðum síðani arbeiðsbólk at kanna hesi viðurskiftini, og síðani at koma við einum tilmæli. Álitið er komið, og har verður mælt til, at vit gera reglur fyri hesi eisini, tí í dag er støðan tann, at tey eru mong, sum hava áhuga at fáa sær útbúgving í júst teimum londum, har vit selja fiskavørur, og hava áhuga fyri at fáa sær útbúgving innan júst hetta her økið. Somulciðis varð hesin arbeiðsbólkurin biðin um at gera eina uppseting um, hvat hetta kom at kosta okkum, og mett verður, at hettar í árinum 1990 kemur at kosta 1,9 mió. kr. Hetta er ikki sett á fíggjarlógina, og fíggjarnevndin hevur ikki fingið boð um hesi tingini, men tá ið lógaruppskot verður gjørt, so verður tað lagt í heyst fram á ting og so er møguleikin hjá fíggjarnevndini at taka tær 1,9 mió. kr. við á fíggjarlógina, tí at vit klára okkum ikki við tær 40 mió. kr., sum eru

settar, sum varð lækkað við teimum 5 mió. kr.

Á grein 15 standa mentunnarmál. Upphæddirnar á hesari grein eru lækkaðar nakað, tó skuldi hetta ikki nerva nakran stovn stórvegis. Onkur tingmaður hevur funnist at hesum skerjingum, og hevur samanborið tølini, við tølini sum stóðu í fíggjarlógini fyri 1989, og hevur enntá útroknað tað í prosentum, munin. Tað er nú ikki altið tað ber til at gera slíkar samanlíkningar og eg haldi ikki, at tað kann gerðast í hesum føri, tí ein konto, fiskirannsóknarstovan í grunn, stóð við 12 mió. kr. 1989, meðan hon í framlagda uppskotið er sett til 0 krónur, tí byggingin er við at verða liðug.

Háttvirdi tingmaður, Tórbjørn Poulsen, fannst at játtani her, ella upphæddini til Fróðskaparsetrið, at hon var ov lítil. Hann helt fyri, at ikki væntaði hann, at hetta bleiv gjørt, meðan Tjóðveldisflokkurin umsat mentunarmál. Til tað er at siga, at Tjóðveldisflokkurin hevur lagt stóran dent á, at Føroyingar fingu sítt Fróðskaparsetur, og eg tori at siga, at uttan leiklut Tjóðveldisfloksins var Fróðskaparsetrið neyvan komið. Hinvegin, so eigur setrið at taka sín part av skerjingunum, eins og aðrir stovnar. Tað er óivað rætt, at teir spara í meiralagi í mun til aðrar, men sjálvir havi eg havt fund við umboð fyri Fróðskaparsetrið, og hava tey boðað frá, at tey royna hvat tey kunnu fyri at greiða sína skyldu við tí upphædd, ið er skotin upp av landsstýrinum. Sami háttvirdi tingmaður, Tórbjørn Poulsen, gjørdi vart við, at upphæddin til Norðurlandahúsið var ov lág, og tað má eg geva honum rætt í, har er komið at standa 630.000 í staðin fyri 645.000 og tað vænti eg, at fíggjarnevndin broytir.

Í løgmansrøðuni verður greitt frá, at landsstýri hevði í hyggju at keypa hølir til sjónvarpið, og at hesi lógu tætt uppat teimum húsum, har sjónvarpið í løtuni arbeiðir. Landsstýri samtykti á fundi í gjár, at keypa umtalaðu hús, og umvæla tey, soleiðis, at tey verða egnaði til endamálið. Húsini eru í trimum hæddum, við einari samlaði vídd uppá 340 fermetrar. Hetta skuldi bøtt munandi um umstøðurnar hjá hesum stovni, men hinvegin meina vit, at hetta er ikki tann besta loysnin.

Tann besta loysnin var at bygt nýggj hús, men soleiðis sum umstøðurnar eru, sær ikki út til at verða meiriluti fyri at byggja av nýggjum, og tí verður hendan her loysnin funnin.

Á umhvørvis økjinum er rættuliga nógv hent tey seinastu árini. Vit hava fingið eina nýggja umhvørvislóg, hon hevur verið í gildi eina tíð, og vit eru nú før fyri at siga, hvørjir fyrimunir og hvørji lýtir eru við lóggavuni. Tað er eysæð, at lógin kom í tøkum tíma, men samstundis mugu vit siga, at tey lýtir sum eru, tey mugu broytast. Landsstýrið er í ferð við at endurskoða lógina, soleiðis at møguligar broytingur verða gjørdar í hesari her tingsetuni.

Brennistøðin á Hagaleiti er farin í gongd, og alt tykist at rigga sum tað skal. Farið er undir at fyrireika byggingina av spilloljuvirkjunum í Eysturoynni, og væntandi verður byggingin liðug innan eitt hálvt ár soleiðis at tað kann taka í móti spilloljuni einaferð í mai mánaða í 1990.

Rættuliga striltið hevur harafturímóti gingið við at sleppa av við øskuna. Kommunur yvirhøvur hava ikki víst serligan áhuga fyri at bjóða fram hóskandi økir. Í Eysturoynni er økið nú funnið til endamálið og endaliga avgerðin fellur fyrst í komandi viku, og alt bendir á, at loysn er funnin. Arbeitt verður somuleiðis við loysnum í øðrum oyggjum í landinum, men er ikki allastaðni komið so væl áleiðis, sum tað er í Eysturoynni, men tað at vóna, at vit koma skjótari í gongd við tey projektini.

Harra formaður!

Tað var formaðurin í fíggjarnevndini sum segði, at hann væntaði ikki, at tær stóru broytingarnar fóru at verða gjørdar tá ið nú hetta her uppskotið kemur í fíggjarnevndina. Fíggjarnevndin hevur rættuliga góða tíð til at arbeiða við málinum, og óivað verða onkrar broytingar gjørdar. Men tað sum hevur áhugað hjá landsstýrinum, tað er tað, at fíggjarnevndin setur seg í samband við landsstýrið, soleiðis at landsstýri og fíggjarnevndin kunnu tosað um hvørjar broytingar skulu gerast, tí tað er hóast alt landsstýri sum skal umsita hetta her og

ti kann tað bara gagna um vit tala um tær broytingar sum skulu gerast.

Eg skal gera eina lítla viðmerking til háttvirda tingmann Jógvan við Keldu sum hevði orðið her í gjárkvøldið. Hann brúkti, haldi eg, ein heldur óhøviskan framburð, við at seta á onkran almennan stovn, og tann stovnurin sum hann legði ettir tað var Landsskúlafyrisitingin. Eg má siga tað, at tað er rættuliga hugstoytt at man leypir soleiðis á ávisar stovnar. Stovarnir hava ikki møguleika at forsvarað seg, teir eru ikki umboðaðir her. Men eg kann siga, sum havi havt í mong ár eitt nært tilknýti til henda stovn, at eg havi eina heilt aðra uppfatan av hesum stovni, enn hana sum Jógvan við Keldu hevur. Eg sat, tann tíð tað var, í Føroya skúlastjórn, og eg var við til at yvirtaka umsitingina á føroyskar hendur og havi sitið í Landsskúlaráðnum síðani. Eg má siga, at tað arbeiði, sum skúlafyrisitingin hevur gjørt, tað hevur verið stak gott og tað hevur riggað nógv betri síðani tað kom á føroyskar hendir, enn tað gjørdi frammanundan.

Takk fyri, harra formaður.

Atli Dam (jv.) viðmerking

Signar Hansen tykist eitt sindur firtin um at Sosialurin ikki hevur gáað eftir, at tey tøl sum Landsskúlafyrisitingin hevur upplýst eru rættað seinni, soleiðis at niðurskurðurin í tí sum er avsett til læraralønir er nakað minni, nevniliga 4 miliónir. Men hetta ger kortini ikki tað, og eg trúgvi nú ikki at Sosialurin hevur framborið hetta her fyri at siga ósatt, men hann hevur kortini ikki verið so langt av leið, tí í tí postinum, sum í so nógvum øðrum postum, sýnir landsstýrið, at tað hevur ikki gáað nógv væl eftir, hvat er veruleiki og hvat ið ikki er veruleiki á økjunum. Tølini fyri lønir blivu í 1988 bugetteraði soleiðis, at man skuldi taka tað við, sum man visti var fallið ella komið uppá 1. mai 1989, og einki annað, soleiðis at tað skulu kortini sparast góð 6% innanfyri hesa upphædd uppá 168 miliónir, nevniliga góð 4% sum man veit at lærarin verður

fyri í lønarhækking í hesum árinum, skulu teir hava tey 6,7% sum aðrir stættir hava fingið, og tað er væl minimum, og harafturat eru fýra dýrtíðarviðbøtir falnar síðan tá, tað vil siga góð 2%, 2,3%, so tað dragast forlods frá hasari upphæddini 6,5%, sum svarar til 11 miliónir, 11 og 4 eru sum kunnugt 15, so, so ella so skulu sparst 15 miliónir innanfyri hasa kontoina. Eingin hevur sagt at fólk skulu sigast upp, men tað skulu sparast til tað sum svarar til árverkini hjá eitt stað ímillum 70 og 90 fólkum í skúlaverkinum.

Jógvan við Keldu (jv.) viðmerking

Harra formaður!

Tað var ein viðmerking til æraða landsstýrismann, Signar Hansen, sum segði at eg hevði brúkt ein óhøviskan málburð í gjárkvøldið í samband við tá ið eg hevði gjørt eina viðmerking til at Landsskúlafyrisitingin ikki virkaði nógv væl. Tað sum málið snýr seg um í hesi løgtingsfíggjarlógardebat, tað er, at vit skulu spara. Tað verður tosað um, at tað er niðurskorið úr 422 miliónum niður á 393, men at tað er farið úr 344 miliónum í 1988 upp í 422 miliónir í 1989 verður lítið tosað um. Tað sum eg segði har, tað er tað, at eg metti at stovnurin sum so var yvirmannaður, tá ið man nýtti tíð til óneyðugt arbeiði. Millum annað tók seg upp ein blaðskriving stutt síðani, hvar ið skúlin í Klaksvík hevði tikið nakrar frídagar og samla teir saman í eitt. Tá møtti ikki minni enn triggir manns úr Landsskúlafyrisitingini norður fyri at seta skúlan uppá pláss. Og tað eru nøkur dømir, sum eg havi í hesum her, hetta er bara eitt av teimum, og eg haldi avgjørt ikki at eg brúkti nakran óhøviskan málburð í hesum her, men eg vil gjarna koma aftur við hesum her, tá ið eg fái orðið aftur, um tað skal útdýpast. Takk.

Signar Hansen (tt.) viðmerking

Harra formaður!

Tað skal verða til Atla Dam enn einaferð tá eg

nevni hatta har. Tann fyrsti sum nevndi hatta har, tað var Atli Dam, hann nevndi tað fyri útvarpinum, og síðani sá og tað í Sosialinum, og eg ringdi til Sosialin og boðaði teimum frá hvar ið teir høvdu mistikið seg, og forklaraði teimum hvussu tað hekk saman, og tey ásannaðu, at tey høvdu gjørt eitt mistak, men tey rættaðu tað ikki. Her er eitt mistak gjørt, og tað hevur Atli Dam eisini gjørt, og tað kann hann siggja í fylgjuskjølunum, at hann hevur gjørt ein feil. Tá hann so framroknar hasar 4 milliónirnar uppá handan mátan sum hann gerð, so má hann eisini framrokna tær 14 milliónirnar, sum hann hevur fingið tær til, hann má eisini framrokna tað. Forholdið verður tað sama, har er ein skeivleiki gjørdur, og tað kann man altíð gera. Men eg meini at man ásannar at man hevur gjørt ein feil og ikki blíva við at trútta, at man ikki hevur mistikið seg.

Vilhelm Johannesen (jv.)

Harra formaður!

Í endanum av tí fyrra umfarinum var eg komin til Tjóðveldisflokkin, og endaði við at siga, at eg skilti eingi av Tjóðveldisflokkinum soleiðis sum hann uppførir seg í hesum døgum. Er talan um nakað positivt, sum hendi meðan undanfarna landsstýri sat, so hevur Tjóðveldisflokkurin alla ærðuna av tí, er talan um nakað negativt so hevur Javnaðarflokkurin alla skuldina av tí.

Eitt dømi um hetta er háttvirdi løgtingamaðurin Karin Kjølbro í 14. september seinasta leygardag. Har skrivar hon um arbeiðsmarknaðareftirlønina og sigur, at orsøkin til at arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin ikki kemur at virka frá 1. januar 1990 er tann, at undanfarni landsstýrismaður, ella táverandi landsstýrismaður í arbeiðaramálum, Vilhelm Johannesen, hevði forsømt at geva líkningarráðnum boð um at gera nakrar tekniskar broytingar. Eg havi gjørt mær tann ómak, at eg havi sett meg í samband við Líkningarráðið og eg havi fingið at vita frá stjóranum á Líkningarráðnum, at tað tók teimum út við eitt ár, einar tíggju mánaðar ella so, at gera hesar teknisku fyrireikingarnar. Soleingi undanfarna landsstýri sat, vóru teir greiðir yvir at fyrireikingar-

nar skuldi gerast. Landsstýrið skifti í januar mánað, og tá vendir Líkningarráðið sær til Tinganes og spyr, skulu vit fara í gongd við at gera hesar fyrireikingarnar, so klára vit tað til 1. januar 1990. Svarið úr Tinganesi var nei, tit skulu bíða inntil tit fáa eitt signal higani, og tað signalið er so ikki komið fyrrenn fleiri, fleiri mánaðar seinni.

Ja, hetta er ein løgin flokkur. Vit lesa í bløðunum at Heini O. Heinesen hann skrivar bræv, opið bræv, til stjóran á Líkningarráðnum, og spyr hann hvussu tað ber til, at fólk verða trekt fyri so nógvan pening. Heini hevur sjálvur sitið her í tinginum og samtykt, at fólk skulu trekkjast fyri so nógvan pening. Og nú í gjár kemur, Gud hjálpi tú mær, Hergeir Nielsen upp her og spyr Ivan Johannesen, hvussu tað ber til at fólk verða trekt fyri so nógvan pening. Og hetta her eru menninir sum skulu stovna tjóðveldi Føroyar. Munnu teir fara at spyrja Ivan Johannesen hvussu tjóðveldið skal fíggjast. Munnu teir fara at spyrja stjóran á Líkningarráðnum, hvar ið peningurin skal koma frá, sum skal gjalda hetta her lýðveldi hjá okkum einaferð.

Tað hevur verið eitt sindur tosað um privatisering. Løgmaður hevur sagt nakað nógv um privatisering í Danska ferðamannablaðnum "Stand By", ja so nógv kanska, at fleiri nammur tora ikki at lata børnini fara út, av ótta fyri at tey verða privatiseraði, hvat ið tað so er fyri nakað. Og har verður nevnt, at Bygdaleiðir skulu privatiserast, strandferðslan skal privatiserast, flogferðslan skal privatissrast og so framvegis. Eg kundi hugsa mær, at løgmaður og hansara partamenn komu her og góðu okkum eina frágreiðing um hin bláa landbilin á Strondum. Tit minnast tá ið borgarliga alternativið sæt, tá skuldi tað sum æt farmaleiðir undir strandferðsluni privatiserast. Og byrjað varð við einum lastbili á Strondum, hann skuldi vera bláur, meðan hinir vóru reyðir. Hann breyt bara av við hinar uppá tveir mátar. Annar var liturin, hann var bláur, hitt var, at hann var nógv, nógv tann dýrasti lanstbilurin sum koyrdi farm her í Føroyum. Eg haldi vit skuldi fingið eina frágreiðing um tað, áðrenn man ferð at tosa meira um privatisering.

Ella hví ikki privatisera tað sum er privat. Nú kann eg bara nevna teir sum eru her í salinum. Hví ikki privatisera Ivan Johannesen og hansara flakavírkið í Miðvági. Hví ikki privatisera Jógvan Ingvard og Olaf Olsen. Hvussu privat eru teirra virksemi? Jú tað er privat, tá tað snýr seg um avgerðarrætt, tað er privat tá ið tað snýr seg um avlop, um vinning og um vinningsbýti, sum er at heinta. Men tá tað kemur til veðhaldini, tá skulu tey verða almenn, tá ið tað kemur til at fáa fíggjarliga hjálp, tá skulu vit til tað almenna, sum so skal út til Palleba fyri at fáa peningin til vega. So privat er hatta privata. Eg haldi vit byrja við at privatisera har fyrst.

So var tað háttvirdi løgtingsmaður Jógvan við Keldu, hann var uppi her í gjár, og eg haldi at maðurin er í ferð við at koyra eina hetz í móti øllum almennum starvsfólkum og í móti almennum stovnsleiðarum. Vit fingu at vita, at nú skuldi luppurin takast fram. Fleiri almennir stovnar skuldu undir luppin. Almannastovan skuldi undir luppin, Landsskúlafyrisitingin skuldi eisini undir luppin og landsskrivstovan skuldi somuleiðis undir luppin. Nú skuldi kannast um hesi fólkini arbeiða nóg effektivt, um nakar møguleiki er fyri at rationalisera nøkur fólk burtur. Tað bleiv enntá sagt, at hesi fólkini sótu har, og tá ið okkurt neyðugt arbeiði var at gera, so tóku tey bara okkurt arbeiði fram, fyri at sleppa frá at gera tað neyðuga arbeiði. Eg má siga, at hetta er beinleiðis ein hetz ímóti almennum starvsfólki. Og kundu vit spurt, tá ið nú luppurin skal takast fram, hví ikki fara víðari við luppinum. Hví ikki taka heilsølumenn og leggja luppin á teir, ella Føroya Fiskasølu ella bankarnar ella grannskoðararnar ella virkiseigaarnar, tað kundi hent, at vit komu fram á okkurt dømi um, at virði á partabrøvum verður skrivað heilt óvanliga nógv upp beint áðrenn kreppan er almenn, tað kundi eisini hent, at vit komu fram á okkurt dømi um at stórar upphæddir verða býttar út sum vinningsbýti til partaeigararnar, eisini áðrenn kreppan er almenn og so fara vit bara til Palleba eftir pengunum.

Essa Arge, háttvirdi løgtingsmaður, hevði orðið

her í gjár, og eg haldi, at hann lýsti nokk so væl støðuna hjá hesi her samgonguni. Hann minti á hitt friðhalgaða hálvtrýs prosenta skattanarkið hjá fólkaflokkinum, og hann sigrdi fast her, at á sini skattablanket, so var tað sum bleiv kraft inn skattur, ikki uppsparing, tað var skattur, hetta segði Eliesar Arge. Hann tosaði um, at hetta varð gjørt við afturvirkandi kraft, og hevur nakar nakrantíð sligið nakað fast her á tingi, so er tað sitandi løgmaður, tað hevur hann gjørt øll tey ár hann hevur verið her, at hann er í móti at gera nakað við afturvirkandi kraft, sum bant borgaran í samfelagnum til nakrar skyldur. Men tað hevur hann gjørt við hesum inntøkulógunum. Hann hevur givið fólki ein eykaskatt við gildi frá 1. januar 1989 og lógin kom miðskeiðis í árinum og uppkrevjingin byrjaði í seinna hálvárið. Og so sigur Eliesar Arge so beinrakið, eg skilji fólk væl, at tey einki skilja. Ja satt at siga, tað munnu tað vera fleiri sum gera. So vísir hann eisini á, hvussu hesin her Fólkaflokkurín svoik lyftið til Kristiliga Fólkaflokkin, tað vóru valla meira enn tvær vikur frá tí at tað stóð í oddagreinini í Dagblaðnum, at Fólkaflokkurin svíkur ongantíð Kristiliga Fólkaflokkin fram fyri nakran annan flokk og tvær vikur aftaná, tá hálvsfevndust teir við Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin og lótu Niels Pauli Danielsen og Tordur Niclasen sigla sín egna sjógv. Og eg haldi at Essa er sera beinrakin tá hann sigur: Fólk hava ikki so lítla orsøk til at ivast í okkara trúðvirði.

Pauli Ellefsen, háttvirdi tingmaður, er ikki her í løtuni, men eg haldi tað er løgi sum Pauli Ellefsen tosar. Eg ímyndi mær Pauli Ellefsen, at hann gongur við tveimum málingablikkum, einum í hvørjari hond. Í øðrum blikkinum hevur hann máling, hon er litað kolasvørt. Í hinum blikkinum hevur hann eina aðra máling, sum er litað hvít. Tá ið hann tosar um tíðarskeiði frá 1975 til og við 1980 og um tíðarskeiðið frá 1985 til og við 1988, so fer hann í tað svarta blikkið og hann málar svart. Men so er tað hitt tíðarskeiðið har hann sjálvur situr sum løgmaður fyri tí borgarliga alternativinum, altso tíðarskeiðið frá 1981 til og við 84, tá fer hann í tað

hvíta blikkið og málar kritað, kritað hvítt. Tá ið man kann loyva sær at standa soleiðis her, dag um dag, viku um viku, ár eftir ár, so má ein kalkulerað við, at meginparturin av Føroyingum eru tápulingar. Vit gera øll feilir, Javnaðarflokkurin hevur gjørt feilir, eg havi sjálvir gjørt nógvar feilir í politikki, altso er Pauli Ellefsen eitt undantak sum ongan feil hevur gjørt? Ja Jóngerð Purkhús sigur ja.

Eg havi bara smáar tveir minuttir eftir, men eg haldi, at eg fari at venda aftur til hesi arbeiðaramálini. Tá ið undanfarna landsstýri sat, tá varð nógv gjørt á ti økinum. Vit útbygdu arbeiðseftirlitið við deildum kring landi. Nú síggja vit longu í dag, at hesar deildirnar skulu takast av aftur. Tær eru skornar í síni játtanum, og løgmaður hevur sagt, at nakrar av teimum skulu takast av og Olaf Olsen hevur sagt, at hann dugir ikki at skilja, at vit skulu hava arbeiðseftirlit á hvørjum tanga. Men peningastovnar á hvørjum tanga, tað er í lagi.

Lógin um frítíð við løn varð framd, eitt stórt framstig, har frítíðin varð longd úr fýra uppí fimm vikur, har frítíðarprosentið varð hækkað úr 9,5 uppí 12% , og har ið løntakarafeløgini fingu frítíðarpeningin í varðveitslu. Vit fingu trygdargrunnin fyri avreiðingar og lønir, sum tryggjar øllum, bæði fiskimonnum og løntakarum á landi, at teir fáa alla sína løn í tilfelli av, at teirra fiskakeypari ella arbeiðsgevari má halda uppat vegna konkurs ella av aðrari orsøk. Og so fingu vit lógina um arbeiðsmarknaðareftirløn og um tann samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Tá var ágangurin ógvuliga stórur, bæði frá Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum, tí hetta her var at bróta skattahámarkið uppá 50%, at vit fara at krevja pening inn í ein arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. Men lat okkum nú lýsa munin. Viðvíkjandi arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum var støðan tann, at hetta varð gjørt fólki greitt næstan tvey ár framanundan at grunnurin skuldi fara at virka. Øll vistu tað, bæði løntakarin, sum skuldi gjalda inn í grunnin og arbeiðsgevarin sum skuldi gjalda inn í grunnin. Síðani skuldi byrjast 1. januar í 1990 við at taka

1%, so skuldi tað stigvist hækkað upp í 1 1/4%, uppí 1½, uppí í 1 3/4 og uppí 2%. Hvat ger man nú við hesi her sokallaðu uppsparingina, man ger tað mitt í árinum við virkningi frá 1. januar í árinum. Eingin fráboðan. Hetta gripur inn í figgjarætlanina hjá hvørjum einasta persóni her í landinum uttan at tey vistu av tí frammanundan.

Ja, tíðin er farin, eg vóni kanska, at eg fái sagt okkurt afturat aftur seinni, annars takk fyri, harra formaður

Hergeir Nielsen (tf.) viðmerking

Harra formaður!

Tað er ein viðmerking til Vilhelm Johannesen. Eg má siga tað, at eg var bergtikin av hansara "in side" vitan um hvussu man úti í vinnulívinum kann drena so stórar upphæddir út í lummarnar hjá teimum einstøku, ikki tí eg visti um nógv av tí frammanundan, men eg undrist yvir, hví tað Javnaðarflokkurin, hann hevur átti leiðsluna eini 14 av teimum seinastu 18 árunum, hví hann bara hevur sitið og hugt eftir hesum her. Hann hevur enntá umsitið fiskivinnumál, eisini íðnaðarmál og so fram eftir. Hann hevur ikki nortið við spurningin. Síðani stingur hann mær nakað annað í skógvarnar enn tað ið eg segði, tá ið eg tosaði um tað trekkið sum var í skattinum hjá summum fólkum. Eg segði ikki, at tey betaltu ov nógvan skatt, at samfelagið plyndraði tey. Tað sum eg segði, tað var tað at tey helst, og tað var tað sum eg bað landsstýrismannin um at kanna, um tey blivu drigin meira enn tey 65%, sum tey eiga at blíva drigin fyri. Eg havi so sjálvur kannað henda spurningin, og út frá teimum konkretu málunum, sum eg kendi til, funnið útav, at Líkningarráðið heldur ikki í tí førinum ferð út um tey 65% í trekki. So um Vilhelm Johannesen kann góðtaka hasa frágreiðingina, so kanska hevur hann betri møguleika fyri at skilja í millum verulig politisk mál og tað skról og tær skrønir, sum hann kemur við.

Karin Kjølbro, (tf.) viðmerking

Harra formaður!

Tað var ein beinleiðis fyrispurningur hjá Vilhelm Johannesen um samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, og lógina, nær hon skuldi setast í verk. Fyrst havi eg hug at siga, at eg taki fult út undir við, at tað sum er privat verður privatiserað og eg rokni við, at Vilhelm Johannesen eisini vil taka undir við, at vinir og kenningar Javnaðarfloksins, sum hava fingið alliloyvi, eisini skulu privatiserast.

Harra formaður!

Tað var á várið í 1988, at vit fingu samtykt lógina um samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargunnin. Vilhelm Johannesen umsat hetta málið, og vit sótu annars í einum útmerkaðum arbeiðsbólki og gjørdu hesa lógina, og vit hava bæði skýrt hetta sum okkara barn, hendan her grunnin her, og tað haldi eg er fínt, og eg eri glað fyri hann. Vit vistu, at tað tók eitt ár til at seta tað í verk. Tað var val í november mánaða og Vilhelm Johannesen varð sitandi sum landsstýrismaður til 18. januar 1989, og lógin skuldi setast í verk 1. januar 1990. Vit vistu, at tað tók eitt ár, vit vistu at tað skuldi gerast broytingar, eitt nú í lógini um P-talið, sum jú er nakað an tí mest kompliseraða at fáa gjøgnumført yvirhøvur, eisini vegna fólk í Javnaðarflokkinum og í Tjóðveldisflokkinum, her var eitt stórt men. Tí mugu vit spyrja hevur Vilhelm Johannesen ikki eina medábyrgd á, at hetta ikki bleiv gjøgnumført tá, tá vit vistu hvussu kompliserað tað var, og tá vit so eisini hugsa um, at vit ikki høvdu uppbakning. Tá ið Adolf Hansen og hansara flokkur kom fyri at gera eina bjargingarroynd, tá undir páskakreppuni í 1988, Gud hjálpi okkum, fór hesin grunnurin niður við 1% fyri at hóva Adolf Hansen. Hvat kundi ikki tað næsta verið, tá ið man vistí, at hetta var so ótrygt. Tí meini eg, at eg havi ikki heilt sagt ósatt, tá ið sagt verður, at Vilhelm Johannesen hevur ábyrgd av hesum her, og tá ið vit fingu eitt landsstýri 18. januar í 1989, sum er so svart, sum vit hava hoyrt so nógv um, hvat fyri vónir hevði Vilhelm Johannesen so um at tað skuldi kunna berast í gjøgnum, tá ið hann sjálvur nakrar fáar mánaðar framanundan

hevði gingið Adolf Hansen á møti.

Heini O. Heinesen (tf.) viðmerking

Tað hevði kanska verið rætt av mær at fráfalli hesa viðmerkingina her, men eg tonkti uppá tað, tá ið eg hoyrdi Vilhelm tosa, at eg kundi sett ein fyrispurning her í tinginum, tá ið man tosar um trúðvirði. Um Føroya fólk trýr, at hesin maður hevur sitið tey fýra sístu árini úti í Tinganesi, tá ið hann tosar sum hann ger. Tað var líka hatta har, sum eg kann skoyta uppí hesar viðmerkingarnar, nú hava tey sagt tað.

Og so er tað tað, at hann spottar við hesum her, hvussu ætla tjóðveldismenn at betala tjóðveldi Føroyar. Tá ið man nú sær at Javnaðarflokkurin líkasum gongur og agiterer við sjálvstýri og øðrum ymiskum, og at vit skuldu heldur samarbeitt við teir enn við Sambandsflokkin. Men eg trúgvi næstan, at teir eru nógv kolasvartari enn hvat sambandið nakrantíð hevur verið. Teir hava ongantíð trúð uppá føroyskan búskap. Og teir hava ongantíð trúð, at vit hava ábyrgd fyri hesum landinum her, men tað hugsi eg, teir góðu sambandsmennirnir trúgva, hóast alt. Tað er tað sum eg haldi, at vit skulu undirstrika, at teir vilja taka ábyrgd fyri sær og sínum landið, tað vilja javnaðarmennirnir ikki. Teir trúgva tað, at vit kunnu liva av donskum arbeiðskonum til ævigar tíðir, men tað kunna vit ikki Vilhelm Johannesen, danskarnir fara ikki at blíva við at gjalda til føroyskan galskap, tað eru vit í Tjóðveldisflokkinum klárir yvir, og vit hava álit á Føroyum og tí føroyska samfelagnum, og tí fólkinum, ið her býr. Men tá ið man sær skrívingina í Sosialinum í dag, tá fer man at ivast í, hvat trúðvirði er í hesum monnunum.

Vilhelm Johannesen (jv.) viðmerking

Harra formaður!

Lat meg bara taka hetta seinasta fyrst. Nú sigur Heini O. Heinesen tað, at teir hava álit á føroyingunum og at vit lata danskar arbeiðskonur gjalda. Tað er ikki

so langt síðani, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jóngerð Purkhús, var í bløðunum. Hon hevði eina loysn uppá gjaldføris trupuleikarnar hjá landskassanum, og tað var at trekningsrættirin í danska tjóðbankanum varð hækkaður úr 100 uppí 300 mió. kr., og eg gangi út frá, at teir pengarnir koma eisini frá donskum vaskikonum.

Síðani var tað Signar Hansen, hann kallaði mína røðu fyri skrál ella skról, hvat hann segði, men tað taki eg mær ógvuliga lætt. So er hann so bilsin um, at eg havi sovornar "in side" informatiónir úr vinnulívinum og veit hvussu man kann drena virkir ella vinnulívsfyritøkur fyri stórar upphæddir. Nú segði eg, at vit kundi komið niður á dømir, sum hatta ið eg nevndi, eg segði ikki, at eg visti um nakað dømi, eg segði at vit kundi komið niður á tað, hatta ber til, tað veit eg, og meira enn tað segði eg ikki. Men eg veit ikki um Signar Hansen segði okkurt um at hann visti dømir, eg hoyrdi hann ikki ordiliga.

So var tað Karin, hon tosar um vinir og kenningar í samband við alilovvir. Eg skal siga, harra formaður, Karin Kjølbro tað, at tá ið vit sótu úti í Tinganesi og viðgjørdi umsóknir um smoltstøðir, tá plagdi eg at tosa um vatnnøgdir, hvussu nógv vatn er til staðar, men hvat søgdu tjóðveldisumboðini: hvørji eru nøvnini, soleiðis gekk tað fyri seg. Og so var tað tann samhaldstasti, hon blívur við at spyrja, um eg ikki hava ein ábyrgd av hesum her. Nú er tað soleiðis, at vit blanda okkum væl ikki uppí hvussu ið almennir stovnar prioritera sítt arbeiði. Líkningarráðið prioriterar sítt arbeiði, og tað, sum eg havi fingið at vita frá líkningarráðnum er, at tað tók út við eitt ár at gera teir teknisku broytingarnar í samband við at samhaldsfasti arbeiðseftirlønargrunnurin skuldi fáast at virka, út við eitt ár. Frá januar í 1989 til fyrsta november 1989 tað er tann tíðin teir skuldi brúka, og so leingi undanfarna landsstýri sat, og tann meirilutin var til staðar, sum samtykti lógina, soleingi var eingin grund hjá líkningarráðnum, at fara í Tinganes at spyrja, skulu vit veruliga gera hetta her? Tað var ein lóg, tað var eir politiskur meiriluti aftanfyri lógina. Men so kemur eitt val, har

tann meirilutin er burtur og so kemur nýtt landsstýri, og so spyr Líkningarráðið og fær at vita, at tit skulu einki fyrireika, tað er svarið sum Líkningarráðið fekk.

Formaðurin (Aguar Nielsen, sb.)

Nú er tað soleiðis, at røðarin sum svaraði aftur uppá viðmerkingarnar var reint persónligur móti einum tinglimi, sum ikki hevði havt viðmerking, tí fær Jóngerð Purkhús orðið til eina viðmerking, ger so væl.

Jóngerð Purkhús (tf.) viðmerking

Harra formaður!

Tað er ikki lukkuligt Vilhelm Johannesen er málskur, hann hevur havt gott av at vera komin í andstøðu, forstandi eg. Men hoyrdi næstan ikki málið í honum tey seinastu fýra árini hann sat í landsstýrinum. Men hatta har sum hann segði um meg og trekningsrættin uppá danska tjóðbankan, tað var akkurát lika skeivt og fordreyðað sum meginparturin av tí sum hann hevur sagt fyrr. Eg havi ongantíð sagt, at tað var loysnin uppá eina búskaparkreppu í Føroyum, men eg havi sagt tað, at tað er rímuligt, tá tú hevur eina fíggjarlóg uppá einar tríggjar milliardir, at vit hava ein kassakreditt, sum kanska kundi svara til eini 10%, tí tað er nú einaferð soleiðis, at tá ið man hevur eitt tílíkt kassaroknskap, at inntøkur og útreiðslur, tær falla ikki javnt í gjøgnum árið, tí helt eg tað, at tað kundi verið rímuligt, eitt sovorið tal.

Anfinn Kallsberg (ff.)

Harra formaður!

Eg eri fulkomuliga samdur við Jóngerð Purkhús, tá ið hon sigur, at tað er gott at Vilhelm Johannesen fekk orlov frá politiskari ábyrgd, tí tann svaðan hann helt her uppi fyri lítlari løtu síðani, hana hoyrdu vit einki til tey fýra árini hann sat úti í Tinganes. Og nú er tað knappuliga henda samgongan, ið bert hevur sitið í nakrar

fáa máanaðar, sum hevur skyldina av, at alt er so ræðuliga ringt sum tað er. Har verður nevnt bankarnir, teir sleppa at gera sum teir vilja. Reiðararnir sleppa at gera sum teir vilja. Tann sum hevur eina íðnaðartyritøku hann ger akkurát sum hann vil. Fiskasølan fær skyldúna fyri alt tað ringa sum yvirhøvur er til. Hesir men hava sitið við ábyrgd, politiskari ábyrgd, sum tað hevur verið nevnt í 14 av 18 teimum seinastu árunum. Nei álvaratos, eg haldi tað, at nú er onkur vaknaður úr dvala, nú hann er komin í andstøðu. Tað einasta konkreta málið hann hevði, tað var um tann bláa lastbilin, sum bleiv reyður, men tað skal eg lova fyri, at har løgdu teir ikki fingrarnar ímillum, tí rokningin var uppá yvir 100.000 kr. fyri at fáa hann reyðan aftur.

Tað sum fekk meg at taka orðið, tað var tað innleggið, sum Jørgen Thomsen hevði her í morgun. Hann byrjaði við at leggja eftir fólkaflokkinum og segði, at Fólkaflokkurin fór út til val og boðaði frá, at vit skuldi niður við skattinum. Tað er rætt, vit fóru út í eitt valstríð, vit halda, at skattatrýstið í Føroyum er ivaleysa høgt, tað er ov høgt. Og so tók hann aftur aftur, at langt var ímillum orð og gerðir. Nei, tað er ikki so langt í millum orð og gerðir. Tí fortreytin fyri at lækka skattinar í Føroyum, tað er, at vit lækka tað almenna landshúsarhaldi. Og tað er júst tað sum fyriliggjandi fíggjarlógar uppskot er byrjanin til.

Tað er tíverri soleiðis, at vit eru noyddir av galdandi lóggávu, og eisini sum Vilhelm Johannesen var inni á beint nú, um tann samhaldsfasta eftirlønartryggingargrunnin. Tað er í gildi í dag ein lóggáva, sum kemur ella eigur at koma í gildi tann 1. januar 1990, hon er lýst, hon er staðfest, nú er eitt broytingaruppskot komið á borðið um at útseta tað í eitt ár, men um tað ikki var komið, og um tað ikki verður samtykt, so verður tann føroyski skattgjalderin trektur fyri hesi prosentini longu frá 1. januar av. Og soleiðis er tað við einum hópi av øðrum tingum. Vit hava arvað eina lóggávu, sum forpliktar landskassan, og vit eru bundnir av hesum, vit eru noyddir at útvega tann pening sum skal til. Men okkara aðalmál er, at broyta hesa lóggávu so-

leiðis, at skyldurnar hjá landskassanum minka, og harvið, at vit kunnu fáa ein skattalætta.

Jørgen Thomsen var eisini inni á, at tað var eitt ógvuliga stórt umskifti sjálvan valdagin. Frammanundan var ikki brúk fyri meirinntøkum, dagin eftir valið var stórliga brúk fyri hópin av peningi afturat og tað er rætt. Eg trúgvi ikki, at tað vardi nakran av okkum, sum sótu i andstøðu, at støðan var so ring sum hon var. Hann skuldi i hvussu so er verið ein av teimum, sum skuldi vita um nøkur av hesum tingum. Eg kann bara nevna eitt, tað sama sum løgmaður var inni á, nevnliga Skála skipasmiðja. Tað var ein fyritøka, sum skuldi verið farin í likvitatión áðrenn valið, men hon var hildin við líka, við kunstigum andadrátti, og so kann man diskutera, um tað var ein politisk finta frá Javnaðarflokkinum ella ikki, men vit hava jú í øllum førum konstanterað, at landskassin hevur mist ein hóp av peningi, bæði av teimum effektivu veðhaldunum, sum eru i skipasmiðjuni og eisini av teimum útleggum sum landskassin hevur frant fyri at gera skipini liðug. Síðani kom hann inn á gjaldsførið hjá landskassanum og vísti á at trekningsrætturin i tjóðbankanum var 0, grunnarnir vóru fullir. Hann samanbar tað við, tá ið teir tóku við 1. januar 1985, tá ið landskassin skyldaði ein hóp av peningi, trekningsrætturin var brúktur á tamb. Lønjavningargrunnurin átti nógvan pening til góðar hjá landskassanum og so framvegis. Tað var eisini rætt, men tað var ein avgerandi munur i millum 1. januar 1985 og 1. januar 1989. Tað var tað, at landsskassin i 89 var væl fyri, men tað føroyska vinnulívið var sanniliga ikki væl fyri. Eg haldi at javnaðarmennirnir áttu at gjørt sær tann ómak, at fari at spurt hvussu stóð til við okkara framleiðslutólum, serliga fiskiflotanum. Hann var væl fyri 1. januar 1985, heilt væl fyri. Men 1. januar 1989 var ein syndarligur standur. Hetta vísir, at man við politiskari snildi hevur yvirført peningin frá vinnulívinum, frá tí berandi, frá fiskivinnuni, yvir i tann almenna sektorin. Eg veit væl, at fiskavirkini vóru ikki væl fyri, men fiskavirkini eru so sannuliga heldur ikki væl fyri 1. januar 1989. Eg trúgvi, at tey vóru ikki verri

fyri í 1985 enn tey vóru í 1989. Skipasmiðurnar vóru ikki nær til so illa fyri í 1985 sum tær vóru í 1989, men sjálvur flotin var betri fyri og nógv betri fyri í 1985 enn hann var í 1989. Man kann altso ikki bara standa og siga her, at alt var ljósareytt í 1989, tí tað vita vit, tað er tað ikki, tað er tað yvirhøvur ikki.

So sigur hann afturat, at man er farin út og man hevur knokkroyt tann føroyska borgaran. Tað er ikki av tí, at vit hava verið so glaðir fyri at gera hetta her. Vit hava gjørt tað av neyð. So sigur hann, at fólkaflokksmenn, teir gristu, tá ið javnaðarmennirnir, ella táverandi samgonga fór út í 1986 eftir eykainntøkum til landskassan. Tað vísir eisini, at fyri landskassansroknskapin var tað als ikki neyðugt at fara út at fáa tær inntøkurnar inn.

Vit siggja yvirskotið í 86, vit siggja yvirskotið í 87, men tað óhugnaliga við tí, er tað, at alt hetta yvirskotið og meira enn tað er við galdandi og broyttari lóggávu farið út aftur í almennum forbróki soleiðis, at 1989 aftur kemur at hava hall. 1988 hevur javnvág nøkulunda, men 1989 kemur ikki at halda stand, og høvdu vit hildið á fram í sama spori í 1990, so høvdu vit eitt drønandi undirskot. Tað er hetta málið, sum vit í samgongunni hava sett okkum, at tað skal ikki verða, og eg eri glaður fyri, at tað finst ein meiriluti á Føroya løgtingi, sum torir at taka hesi tøkini.

Jógvan Adolf Johannesen úr Javnaðarflokkinum var inni á hesum her, at ágóðarnir í samfelagnum vóru so skeivt fordeildir úti um landið, og tað kann vera nakað um tað, eg eri ikki ósamdur í tí, men eg trúgvi, at møguleikarnir í dag hjá okkum at gera tær stóru samfelagsíløgurnar eru rættiliga avmarkaðir. Hann nevndi eitt konkret mál, sum er eitt ógvuliga lítið mál. Har má eg siga, at eg eri fullkomiliga samdur við honum, tað var asfaltstuðningurin. Hatta er eitt mál, sum eg ógvuliga ofta havi reist eisini, og hatta kostar ikki nakrar eykapengar, hatta er bara ein spurningur at finna ein annan málistokk fyri at fordeila, og eg haldi, at vit skulu lata tað fara víðari til samferðslunevndina at taka hatta málið upp.

Síðani vóru tað sjálvstýrismenninir Lasse Klein og Tórbjørn Poulsen, sum hava funnið sær ein kepphest at koyra við, og tað er politiska upplýsingin og tað eru bíðipengar. Nú er tað soleiðis, at bíðipengar eru ásettir við lóg, tann lógin er frá 1971, og hon er broytt í 1984. Í 1984 var Sjálvstýrisflokkurin sjálvur við, hann umsat fíggjarmál, tað var einki skriggj frá Sjálvstýrisflokkinum um ta broytingina, sum tá varð gjørd, eg var sjálvur í landsstýrinum tá. Fyri tað um tingmenn og landsstýrismenn hava rætt til at fáa bíðipening, so hava teir tann møguleika, at teir kunnu frásiga sær henda rættin. Tað er einki vandamál, at teir siga, vit vilja ikki hava hesar pengarnar. Eg havi gjørt mær tann ómak at spurt, um nakar bíðipeningur kemur retur, tað kemur tað ikki. Eg vil hervið heita á formannin kanska at bera boðini víðari til fyrrverandi tingmenn hjá flokkinum, at tann møguleikin er also til.

Annars var tað ein ógvuliga áhugaverdur spurningur, sum Heine O. Heinesen reisti her viðv. dupultum og trý dupultum tingmannalønum, men eg fari at ávara í móti at gera eina skipan soleiðis, at tað bert verða skúlalærarar og fastlønt fólk, sum manna løgting og landsstýri, tað má gerast ein skipan soleiðis, at persónar úr fríu vinnuni, sum skulu t.d., tá ið teir fara í landsstýrið, fráleggja sær øll borgarlig størv, at teir hava ein fíggjarligan møguleika at taka av einum landsstýrissessi. Verður tað avtikið, so hevur man ikki tann møguleika, men Fólkaflokkurin er altíð til reiðar at viðgera hatta málið.

<u>Marita Petersen</u> (jv)

Harra formaður.

Orðaskiftið snýr seg bæði um løgmansrøðuna og fíggjarlógaruppskotið fyri 1990. Tað eru ymiskar meiningar, um tað er rætt at taka hesi bæði mál undir einum ella gera tað hvørt sær, eg kann tí siga, hvat ið eg halði. Eg haldi tað hevði verið betri, um tað var hvørt sær, tí eg haldi, hetta eru so mikið stór mál, at tað hevði givið betri tíð og møguleikar at funnið fram til,

hvat tað er fyri politikkur, ið skal førast. Við at taka tað undir einum, er tað jú avmarkað, hvørja talutíð vit hava, og hvussu hon kann brúkast.

Eg vil í hesi viðgerðini mest viðgera, fíggjarlógaruppskotið, men eisini nerta eitt sindur við løgmansrøðuna.

Eg vil biðja formannin um leyvi til at taka burtur úr viðmerkingunum til fíggjarlóga og úr løgmansrøðuni undir einum.

Onkur hevur sagt undir hesi viðgerð, at fíggjarlógin er tað stýringsamboð, sum eitt stýri hevur í samfelagnum. Eg eri ikki heilt samd í hesum, tí eg meini, tað er annað, sum er stýringsamboðið. Fíggjarlógin sigur meira um, hvussu pengarnir skulu brúkast, tað er ein fíggjarætlan, og hon sigur harvið, hvat tað er fyri ein politikkur, sum samgongan ætlar at reka.

Um vit samanbera hesi bæði mál, sum vit hava til viðgerðar, kunnu vit siga tað, at í veruleikanum sigur fíggjarlógin meira beinleiðis um tann politikkin, sum ætlanin er at føra, enn løgmansrøðan. Tað, sum man leggur merki til, tá ið mann lesur hesi bæði er, at tað ikki altíð er samsvar í millum tað, sum løgmaður hevur sagt á ólavsøku og tað, sum stendur í fíggjarlógaruppskotinum.

Onkur hevur sagt, at løgmaður í røðu síni segði eínki, men tað haldi eg vera skeivt at siga, tí tað verður nakað sagt í hesari løgmansrøðuni, og onkur øki verða kanska eitt sindur harðliga tiklr fram, og tað er kanska serliga arbeiðara-, lønar- og prísmál.

Lønarsamráðingarnar, leggur løgmaður stóran dent á, hendu í friði og náðum, tað vóru eingi verkføll og alt var gott. Nú var tað soleiðis, at fyrireikingin varð gjørd nokk so góð, tað var longu sáðað mistreysti í millum fólk og løntakarar. Tað var spáað øll verðsins ólukka fyri land og fólk, og sjálvsagt allir føroyingar eru góðir við sítt land og allir vilja gera sítt til, at tað skal verða gott, og tí eru fólk kanska eitt sindur ávirkað av hesum dómadagsprædikum, sum verða sagdar. Tí kanska kann mann siga, vóru úrslitini av sáttmálasamráðingunum tað heilt øðilíga stóra, men kortini soleiðis hildu fakfeløgini, at tað var til at kunna liva

við.

Síðani er tað hent, at tað, sum tey fingu og gott og væl tað, er tikið inn aftur í skatti og avgjøldum og harafturat er boðað frá, at lóggávan um prístalsviðgerð av lønum skal avtakast, og hetta haldi eg - eg haldi orðið er sagt fyrr á tingi, so eg kann gott siga tað - hetta haldi eg faktisk er lump. Feløgini fara út og føra samráðingar á einum grundarlagi, sum tey halda seg kenna, tá ið samráðingarnar eru liðnar, so er knappliga eitt annað grundarlag.

Tað kann gott verða, at prístalsviðgerðin av lønum skal takast av, men tað rætta og einasta sámiliga má verða tað, at fakfeløgini kenna støðuna og vita tað, áðrenn tey fara í holt við samráðingarnar, tí so kunnu tey samráðast á tí grundarlagi, sum veruliga er. Fyri kanska at fáa hetta at gliða eitt sindur betur niður, verður eisini boðað frá, at í samband við hesa avtøkuna av prístalsviðgerðini skal setast vinningssteðgur.

Tað tykist eitt sindur undarligt, at boða frá fleiri mánaðar framman undan, at vit fara at innføra eina lóg um vinningssteðg. Lóg um vinningssteðg hevur týdning, um hon kemur frá einum degi til annan, eingin fyrireiking, eingin veit um tað, alsc soleiðis sum her at boða frá frammanundan, hatta líkist ongum. Harumframt kunnu vit síggja, hvat fyri álvara er í tí.

Um ein lóg um vinningssteðg skal hava ávirkan og týdning, so er neyðugt, at prísansingin er góð. Hyggja vit eftir á figgjarlógaruppskotinum, so síggja vit, at játtanin til prísráðið er lækkað, sjálvt um prísráðið vísir á í sínum viðmerkingum, at tað ber illa til at røkja tað arbeiðið, sum er í gongd nú.

Tað hevur nógv verið tosað um her av samgongufólki, at hetta er eitt sparuppskot, og at hetta er neyðugt, tí at marglæti javnaðarfloksins hevur koyrt alt út av lagi.

Nú skal eg ikki taka so nógv støðu, nú havi eg ikki verið við fyrr og skal ikki taka so nógv støðu til tað, sum hevur verið gjørt, men eg kundi hugsað mær at sett nakrar spurningar til hesi fólk. Hvat skuldi ikki verið gjørt? Fiskivinnuskúlin í Vestmanna, skuldi hann

ikki verið komin? Dagpeningaskipanin, sum vit hava, skulu vit ikki hava hana? Landsmiðstøðin fyri undirvísingartilfar, skuldi hon ikki verið komin? Bergholið til Kunoyar, skuldi tað ikki verið komið? Ella tað í millum Kalsbak og Signabø, skuldi tað ikki verið komið? Handilsskúlin í Kambsdali, skuldi hann ikki verið bygdur? og mangt, mangt annað.

Hetta er tað, sum pengarnir m.a. eru játtaðir til. Eg kundi nevnt eitt afturat, eftir sum tað hevur verið so nógv tosað um tað, sjúkrahúsið í Klaksvík skuldi tað ikki verið útbygt? Hetta eru spurningar, og eg havi bara tikið burtur úr tí nógva dunganum, sum pengar eru brúktir til ikki bara tey seinastu 4 árini, men eisini árini frammanundan.

Eitt verður beinleiðis sagt um, hvat av hesum skal burtur í teimum viðmerkingum, sum fyriliggja til hesa figgjarlóg. Við at lesa figgjarlógaruppskotið fáa vit eina mynd av tí, sum henda samgongan heldur ikki skuldi verið gjørt, hóast sumt av tí tykist ógreitt.

Orkur hevur funnist at hesum fylgiskjølunum, nú havi eg ikki sæð tey fyrr burtursæð frá teimum til seinastu figgjarlóg, so eg vil nokk taka undir við tí, sum m.a. Jógvan Durhuus segði í gjár, at tað er øðiliga trupult at finna út av hesum, her liggja bara nøkur brøv, tað liggja ongar niðurstøður, eingi viðmælir, ongar frágreiðingar um nakað sum helst. Men so vítt eg kann síggja av teimum brøvum, sum liggja, so hvur landsstýrið tann 27. juli 1989 sent brøv út til stovnar við boðum, hvussu nógv teir fáa játtað á tær ymisku kontoinar, eg veit ikki um tað er til øll tá, men tað kann eg so íð hvussu so er síggja á nøkrum. Teir siga, so nógv fáa tit.

Signar Hansen sigur í 14. september, at hetta eru bara upplegg til at samráðast um, meðan Ivan Johannesen sigur í Dimmalætting, at hetta eru harraboð, hetta eru boð um, so nógv fáa tit og einki meira.

Eg veit ikki, hvussu nógv tað er samráðst, tað kann eg ikki síggja av hesum, men íð hvussu so er síggi eg, at nakrir stovnar hava kunna tosað so væl fyri seg ella hava gjørt landsstýrið so greitt um støðuna, at tað

hevur eydnast teimum at fáa hækkað eitt lítið sindur um tað, sum annars var komið út.

Eg kundi hugsað mær at sagt nakað um nøkur av málunum, tíverri eru ikki stuðnir at taka alt.

Nú var sovorðið kjak í áðni um skúlamál, so eg haldi, eg bara byrji við tí, so fáa vit tað greitt. Tað kann verða eitt sindur ringt at lesa innanat, skilji eg hjá fólki, so tað er kanska ikki so galið at fáa tað ígjøgnum. Har stendur, at tann samlaða sparingín til skúlaøkið § 14 er ÷30 mió.kr., tað er ein sparing upp á umleið 7% og hetta kann í fyrsta umfari tykjast bíligt. Tað er bíliga sloppið, tá ið man samanber við, hvat ið onnur heva skula goldið.

Skotið varð upp av landsstýrinum í brævinum frá juli mánaða, at fólkaskúlin fekk 158 mió.kr. Í tí, sum kemur aftur við viðmerkingum frá Landsskúlafyrisitingini, verður víst á, at tað ber ikki til at klára seg við minni enn 178 mió.kr. uttan at broyta nakað sum helst. Í svarínum frá Landsskúlafyrisitingini verður sagt, at landsskúlafyrisitningin kann ikki við núverandi lógarkarmi taka avleiðingarnar av hesum niðurskurði, sum verður. Tað verður víst á, at tað, sum eitur fólkaskúlin, hevur triggjar kontoir, og tað er tað, sum eitur læraralønir, lærarapensiónir og ymiskir studningar. Víst verður á frá Landsskúlafyrisitíngini, at lærarapensiónirnar eru lógarbundnar, vit leppa ikki undan teimum, fyrr enn lærararnir ella hjúnarfelagarnir, sum fáa pensión, doyggja. Nr. 2 er ymsir studningar og meginparturin av tí er til skúlabarnaflutníng, tað eru lógarásettar útreiðslur, sum ikki kann gerast nakað við, so tað 3. staðið, sum tað eihasta staðið, ið faktisk nakað kann gerast við, tað eru læraralønir.

Nú hevur verið tosað so nógv um og boðini skulu hava verið skeiv, tá tað hevur verið sagt og staðið í bløðunum og ikki, men um vit lesa tað, sum stendur í hesum viðmerkingunum frá Landsskúlafyrisitingini, og tað rokni eg við, at landsstýrismaðurin í skúlamálum kann taka undir við líka so væl, sum landsskúlastjórin kann taka undir við tí, so stendur tað, at um vit ikki fáa 178 mió.kr., so verður tað 20 mió.kr. ov lítið, og har-

við mugu sparast útreiðslur til 20 læraraplass.

Tað, sum hendir, er at fólkaskúlin fær 10 mió.kr. meira, t.v.s. at teir fáa 158 mió.kr. í staðin fyri 158 mió.kr., og tað vil siga, so er tað ikki til 94 lærarastørv, men so er tað til helvtina av 94 t.v.s. 47 lærarastørv. Sambært útrokningarnar frá Landsskúlafyrisitingini og tað er tað er tað einasta, sum eg sum tinglimur havi at halda meg til, tí eg havi ikki nakrar aðrar viðmerkingar og eg kann ikki síggja annars, hvussu ið landsstýrið hugsar sær, at tað skal sparast á hesum økinum.

Signar Hansen hevur sagt nakað um, at tað skal rationaliserast, eg haldi, hann segði tað soleiðis, og frá leiðsluni á Landsskúlafyrisitingini er sagt, at eingin lærari skal sparast. Tað vil also siga, at út frá tí mugu vit rokna út, at tað mugu koma lógarbroytingar á skúlaøkirum, tað er øðiliga spennandi og vit eru eitt lítið sindur bangin um, hvørjar tað kunnu verða.

Eg kundi hugsað mær at nevnt eitt sindur meira um skúlaøkið, sjálvt um tað er ikki spart so ógvuliga nógv, men eg haldi tað vísir eitt lítið sindur á tann mátan, sum henda fíggjarlógin er gjørd. T.d. verður sagt frá handilsskúlaleiðsluni til tað brævið frá landsstýrinum, at um handilsskúlin skal klára tað við tí, sum landsstýrið hevur skotið upp, so mugu teir láta annan handilsskúlan aftur, og tað vil also siga tað, at vit kunnu rokna út, at skúlin á Kambsdali verður latin aftur, áðrenn hann lat upp. Tað hjálpti, teir fingu 3 mió.kr. afturat.

Hjá læraraskúlanum er tann sama játtanin, sum var seinasta ár. Har verður sagt frá leiðsluni á læraraskúlanum, at sostatt ber ikki til at reka skúlan innan fyri teir tillutaðu karmarnar komandi ár uttan brot á ta lóggávu, sum undirvísingin byggir á. Tað vil also siga, at vit kunnu eisini rokna við, at vit fáa lógarbroytingar har.

Um vit taka studentaskúlan í Hoydølum, so verður sagt tað, at um tað skal sparast, so vil tað siga, at einasta stað, tað kann sparast, er læraralønin, og tað førir við sær, at tað verða færri næmingar, sum koma í

skúlarnar, og leiðslan heldur, at hetta er ein politiskur spurningur, sum politikarar eiga at taka støðu til. Tað vil og geva leiðsluni fullkomiliga rætt í, at tað eru politikararnir, sum hava ábyrgdina, um tað verður spart so, at næmingarnir ikki sleppa í skúla.

So var tað tað seinasta, og síggi, at nógv er farið av tíðini, eg komi nokk upp aftur, men eg vil fegin gera tað seinasta við skúlan liðugt, og tað er frítíðarundirvísingin. Har verður líkið so harðliga til frá landsskúlafyrisitingini, nú hevur tað verið so nógv við at fara aftur í 60-ini og 50-, men her siga teir, at teir skulu aftur til byrjanina av hesi øldini, fyri at koma til ta støðu, sum er, soleiðis stendur tað orðarætt.

Til alla lukku verð niðurskeringin ikki so stór, sum roknað varð við í fyrstni, men hon hon verður stór, og eg haldi, at vit kundu væl hugsa okkum at fingið nakrar viðmerkingar um, hvat hetta eru fyri lógarbroytingar, vit kunnu vænta okkum á skúlaøkinum, hvat tað er fyri slag av skúla, og hvussu til ber at rationalisera.

Vit liva í eimum cyggjasamfelag, har vit hava smáar bygdir og vilja fegin hava, at fólk verða búgvandi har. Tað er ein fínur máti at rationalisera upp á við at flyta øll børnini úr smábygdunum til tær stóru, við at niðurleggja eina rúgvu av skúlum, men er tað tað vit vilja?

Formaðurin

Tað verður átalað, at tað verður sagt frá tingsins røðarapalli, at løgtings- og landsstýrismenn lumpa fólk.

Lasse Klein (sj)

Harra formaður.

Fyrst skuldi tað verða eitt stutt aftursvar til Anfinn Kallsberg. Hann tosar um, at Sjálvsstýrisflokkurin hevur ein kepphest, og hann tosar um hetta viðv. bíðilønunum og síðani politiska upplýsing. Hartil er at

siga, at vit hava sett uppskot fram um avtøku av hesum, og eg kann í hvussu er vissa Anfinn Kallsberg um, at vit koma framhaldandi at gera tað, og eg kann eisini siga Anfinni frá, at vit hava víst á eina rað av møguleikum, har íð vit kunnu spara, og vit koma eisini framhaldandi at gera tað.

Harra formaður. Bæði í 20-unum og eisini í 30-unum hildu menn seg hava eina fullgóða loysn í samband við búskaparkreppu. Øll skuldu spara, og tey almenn løntu skuldu niður í løn, og soleiðis varð eisini gjørt, men úrslitið var óhugnaligt. Skatta- og tollinntøkurnar minkaðu í stóran mun, tí minni peningur var millum fólk, minni var at keypa og byggja fyri, framleiðslan minkaði, og tann undurviðgerðin, sum skuldi bjarga samfelagnum, endaði í ovurholds stórum arbeiðsloysi.

Tað vísur seg, at tey, ið halda seg hava skil fyri sínum, eru enn ikki komin longur í fíggjarliga hugflogi sínum, enn vit vóru komnir í 30-unum. Ikki minst eru inntøkulógir og tey uppskot, sum samgongan hevur lagt fram, prógv um hetta. Mitt í øllum hesum stendur menniskjan, stendur familjan, tað er hana, alt snýr seg um. Búskapur snýr seg ikki einans um deyð ting, fígging er ikki bert krónur og oyru, talan er ikki bert um pening, tløgur og fiskatrot, men eisini um menniskja, ið antin dugur ella ikki dugur sær hógv. Tað batar ikki at tosa um politikk og um búskap uttan samstundis at tosa um menniskjuna, sum jú er tað, ið samfelagið, politikkur, búskapur og kreppan snýr seg um. Vit mugu gera greitt, at ein búskaparkeppa er ein menniskjalig kreppa.

Fíggjarlógin og tølini eru neyðug, men ein sannur miðflokkur, sum Sjálvstýrisflokkurin jú er, gloymir ongantíð, at fíggjarlógin og tølini eru til fyri menniskjans skuld og ikki umvent, soleiðis sum samgongan ger tað til.

Harra formaður. Vit mugu viðganga, at henda viðgerðin á mangan hátt hevur verið sera løgin. Vit hava lagt til merkis, hvussu samdir samgongumenn tykjast vera, vit fáa rætt og slætt varhugan av, at Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hálsfevnast til tíðir, munurin teirra millum er eingin. Vit hava eisini fingið

týðulig prógv fyri, hvussu væl teir hava at snúgva sær í orðaleiki, sum er farin fram. Men eg eisini, at tað er lætt at avdúka marglæti teirra. Einasti samgongumaður, tað tykist at glógva í, og sum veruliga hevur fatað avleiðingarnar av tí politikki, sum henda samgongan rekur, er hattvirdi tingmaður Eliesar Arge úr Fólkaflokkinum, og tað skal hann eisini hava tøkk fyri.

Tað var serliga formaður sambandsflokksins Pauli Ellefsen, sum segði, at hann ætlaði sær ikki at verða við til at senda rokningina út til skattaborgaran, fyrí síðani at snara 100%, og so kom hann aftur og var sera bersøgin, hann segði, at tað var neyðugt at fara út til skattaborgaran, ja, hann segði beinleiðis, at stóð tað upp til hansara, so hevði hann tikið enn tá nógv fleiri skattakrónur frá fólki, tað var hann samdur við Ivani í. Hvussu skal hetta í veruleikanum skiljast? Vit standa framvegis spyrjandi, hvat vil hesin maðurin og hvat meinar hann, harra formaður?

Og so søgan um trotabúgvið, um stjóran, sum ikki skuldi sleppa fram at eini fyritøku, sum hann sjálvur hevði koyrt av knóranum, og her meinti hann við Atla Dam. Atli Dam kann svara fyri seg sjálvan, men Pauli Ellefsen hevur sjálvur hjálpt fyritøkum og stjórum av fyritøkum, sum fleiri ferðir eru farnir av knóranum. Hvussu ofta gjørdi hann ikki hetta, tá hann sjálvur sat sum løgmaður? Hetta gjørdi hann jú ótaldar ferðir, og undir hesi viðgerðini, sum er farin fram her, var løgmaður, harra formaður, rættiliga braneggjaður. Við bersøgdum orðum langaði hann út og segði, at øll eiga vit hesa nýtsluna, sum er farin fram her í samfelagnum, øll eiga vit part av uttanlandsskuldini, av skuldini í síni heild í hesum samfelagnum. Hetta er, harra formaður, heilt einfalt ein fantastiskur pástandur at skuldseta føroyska verkamannin at eiga nýtsluna, sum hann als einki eigur í, og at skuldseta verkamannin at eiga eina skuld uttanlands, sum hann einki eigur í. Eg hugsi, at hetta eigur ikki at sleppa at verða ótalað, harra formaður. Hevði tað verið loyvt, so høvdu vit sjálvsagt spurt løgmann, hvat hann bilti sær inn at koma her frá løgtingsins røðarapalli og siga, at tað er verkamaðurin,

sum eigur nýbygningarnar, sum eigur skip og bátar, sum grannskoðaravirkini hava slúsað í gjøgnum líggjarrevndina, og so allir hesir handilsbygningarnir, sum liggja sløgdir ymsa staðni runt um í landinum og serstakliga her í Havnini, hetta og slíkt kann løgmaður ikki meina. Tað ber ikki til at geva verkamanninum skuldina fyri nakað, sum hann onga, yvirhøvur onga skuld eigur í.

Pauli Ellefsen hevur fleiri ferðir undir hesum orðaskiftinum spurt, nær ið mistøkini vórðu gjørd í hesum samfelagnum, og hvør ið hevur skapt kreppuna. Tann spurningin hevur formaður sambandsflokksins fleiri ferðir sett, ikki tí, hann veit sjálvur, hvør hevur høvuðsábyrgdina av hesi kreppu, hann veit, at tað eru ráðgevarar vinnunnar fyrst og fremst, sum seinastu 10-15 árini hava fingið einar 500 mió.kr. fyri teirra ráðgeving, hann veit eisini, at hann er ein av teimum, sum í dag situr hinumegin borðið og skal játta pening fyri miseydnaða ráðgeving, rætt og slætt ein av høvuðsmonnunum aftan fyri ta kreppu, sum hetta samfelag er í. Tað er ikki neyðugt hjá Paula Ellefsen at spyrja aðrar. Svarið finnur hann hjá landsstýrislimum, og svarið tinnur hann eisini í millum samgongumenn.

Tað var Vilhelm Johannesen, sum var her og tosaði um, at nú skuldi tað kannast við luppi. Eg kann upplýsa, at danska bakmanspolitiið t.d. er farið í holt við at kanna við luppi frágreiðingar og annað, sum statsgóðkendir grannskoðarar hava latið úr hondum, og tað framgongur av eini grein í Politikken í august 1989, har man kann lesa: "Jeg ved, at der er udtaget flere stævninger mod revisorer", og serliga er tað í samband við fíggjarætlanir og frágreiðingar o.a., tann, sum úttalar seg í hesum sambandi er statsadvokaturin Michael Clan.

Pauli Ellefsen segði, at eingin av hansara kenningum hevði merkt til hetta skattatrýstið, hesa tvungnu uppsparingina, sum Sambandsflokkurin hevði sprongt hetta skattamarkið við. Tað skilji eg so heilt eintalt væl, at teir ikki skilja tað, tí at tey fólkini, sum hann kemur saman við, hava møguleikar at avskriva seg niður á 0.

Harra formaður. Sjálvstýrisflokkurin er ikki, sum mong vilja verða, úti eftir at spenna bein ella vinna

sær politiskar fyrimunir av tí støðu, sum er í hesum samfelag. Skulu vit bøta um viðurskiftini í fiskivinnuni, krevur tað politikarar, ið tora at taka avgerðir og ikki slíkar, ið bert hugsa um løtuvinning og atkvøður. Tá ið nú Sjálvstýrisflokkurin sameindur slær nevnan í borðið, so er tað fyrst og fremst fyri at vekja fólk úr nationalromantiskum og búskaparligum dreymum og at leiða samfelagið inn á ta realpolitisku kósina, einasta gongda leið hina í millum vinstra og høgra.

Fiskivinnan er høvuðsvinna okkara, hon skal hjálpast, men spurningurin er bara hvussu. Sjálvstýrisfloksins støða er tann, at tað er av stórum týdningi, at tað skal fylgja størri fíggjarlig ábyrgd við teimum íløgum og teimum veðhaldum, sum verða sett í vinnulívið. Um hetta hevði verið gjørt, og hevði hetta verið gongdin, so høvdu munandi minni skeiva íløgur verið gjørdar. Í samband við fíggjarlógaruppskót samgongunnar fyri 1990 eru skotnar upp stórar hækkingar. Eg kann ikki annað enn verða samdur við Hergeiri Nielsen, háttvirda tingmanni um, at hann longdist eftir loysnum í sambandi við fiskivinnuna, ja, hann longdist eftir eini frágreiðing um, hvat tað var, sum samgongan ætlaði og hvønn fiskivinnupolitikk, hon ætlaði at reka. Sum kunnugt er eingin fráboðan komin enn, hvønn fiskivinnupolitikk, henda samgonga ætlar at reka, og eg fái í einum seinni umfari studnir til at koma eitt sindur nærri inn á tey viðurskifti.

Heini O. Heinesen (tf)

Harra formaður.

Eg havi nú sitið og lurtað á orðaskiftið um løgmansrøðuna og fíggjarlógina fyri 1990.

Flestu tingmenn hava havt orðið einaterð og nakrir hava havt tað tvær ferðir. Eg trúgvi ikki, at føroyingurin er vorðin so nógv klókari av hesum her. Eg ætlaði at gera nakrar viðmerkingar til tað, sum serliga teir í andstøðuni eru komnir fram við, men eg má siga sum er, at andstøðan er so tannleys, at eg havi einki funnið, sum eg kann viðmerkja, so at eg má heldur fara

yvir til sjálva fíggjarlógina.

Tað var Atli Dam, sum viðgjørdi Tjóðveldisflokkin. Fyri mær ljóðaði tað, at hann meinti, at Tjóðveldisflokkurin var ein jolla av Javnaðarflokkinum, tað vilja vit í Tjóðveldisflokkinum yvirhøvur ikki góðtaka, at vit eru nøkur jolla hjá Javnaðarflokkinum. At vit hava havt gott samarbeiði við Javnaðarflokkin, tað skammast vit ikki við, sjálvt um skeivar avgerðir eru farnar fram har, tað vil so verða har, sum nakað hendir, har spillist eisini nakað, tað er klárt, so eg haldi ikki, at eg tími at fara so nógv inn á hetta.

Hann spyr í sínum innleggi, um tað er Heini O. Heinesen ella Óli Breckmann, sum mynda hesa samgongina, so hvat meira hann nevnir har, haldi eg er ikki vert at taka upp á tungu.

So er tað Tordur Niclasen, hann kemur higar og losar um hesar ræðuligu sparingarnar, sum eru á fíggjarlógini. Hann sigur, at teir kristiligu hava einki í móti at spara, men tað er bara, hvar man skal spara, tað koma teir als ikki við. Tað er hetta, sum eg haldi, man skal vísa á, tá tað man tosar um fleiri hundrað milliónir í sparingum, so má man vísa á, hvar ið man skal spara.

Vit samráddust um eina sangongu herfyri, og tá skuldu vit royna at gera niðurskeringar. Man sat og arbeiddi við tølum, og tá ið grannskoðarar eru við, so vita øll, at tá fíggva tølini ógvuliga høgt. Tað var onkur, sum kom til tað úrslit, at fíggjarlógin hevði eitt undirskot upp á 900 mió.kr., men tað er so ikki konstaterað enn, tað undirskotið, tí skatturin er í hvussu so er oman fyri tað, hann var í fjør, so hatta undirskotið er ikki heilt rætt.

So skrivar man í ymiskt, nú er var tað Sjálvsstýrisflokkurin, sum skrivaði álit, tá ið hann leyp fyri borð upp á nøkur sjálvstýrismál, tá skrivaði hann í einum áliti, at vit skulu spara so og so nógvar 100 mió.kr. á fíggjarlógini uttan at nevna hvar. Tað er tað, sum er umráðandi, tá ið man er út upp á sparingar, so er at nevna, hvar man sparir.

Nú hevur verið grinið at tí, sum eg haldi, tað var, Ivan, ið segði, at fíggjarlógin hevur tvær síður,

men inntøkusíðan er minst líka týdningarmikil sum útreiðslusíðan, og so standa her og bara viðgera eina útreiðslusíðu og vera í øðini um tað, at tað eru nakrar skerjingar og als ikki viðgera inntøkurnar.

Eg kann taka nakrar greinir á fíggjarlógini, sum eru niðurskornar. Ja, tað var satt, tað var Sjálvstýrisflokkurin, sum tosaði so ógvuliga nógv um løgtingið, nú er tað vorðið tað stóra dýrið í hesum samfelagnum, tað skal helst verða avtikið, eftir sum eg skilji, og tað skulu helst bert verða tveir tingmenn úr sjálvstýrisflokkinum, sum avgera fartin, men tað, sum eg spurdi Tórbjørn Poulsen um í morgun, tað var hetta her um teir, sum hava 2 og 3 lønir umframt sína løgtingsmannaløn, tað er hatta har, sum eg haldi, kostar samfelagnum, har kundi man spart pening.

Vit vita tað, at løgtingið kostar 9.297.000 kr., tað er tað, sum løgtingið kostar alt, sum tað er. Tá ið man tosar um bíðipening, nú nevndi Tórbjørn eisini bíðipening, tann upphæddin er 1 mió., eg havi einki í móti at avtaka bíðipening, og persónliga haldi, hann kundi gott verði avtikin, um man kann koma aftur í sítt starv, tá ið man fer út úr politikki, tað er so aftur ein metingarspurningur.

So kunnu vit taka aðrar konti, eg trúgvi ikki, har verður so nógv at vinna, so fyri tað kunnu teir gott bera nógv uppskot niðan í tingið, eg vænti ikki, at nógv sparing verður har, tað rokni eg als ikki við.

So kunnu vit taka t.d. heilsuverkið, har er nokkso stóru niðurskurður. Vit kunnu taka landssjúkrahúsið, tað verður niðurskorið úr 244 mió.kr. niður á 207 mió.kr. Tað er ein niðurskurður upp á 36,8 mió.kr. So taka við Klaksvíkar sjúkrahús, tað verður niðurskorið úr 44.800.000 kr. niður á 39.431.000 kr., tað er ein niðurskurður upp á 5,5 mió.kr. So taka vit Suðuroyar sjúkrahús, tað verður niðurskorið frá í ár til næsta ár úr 27.080.000 kr. niður á 23.277.000, tað er ein niðurskurður upp á 3,8 mió.kr. Nú havi eg ikki roynt at rokna prosentpartin í hesum, so er hopi hetta liggur nøkulunda á leið. Tað er møguligt, at landsstýrismaðurin í sjúkrahúsmálum greiðir okkum nakað frá hesum, hvørjar fylgjur

hetta fær fyri heilsuverkið, hesar sparingarnar, sum eru her.

Tann samlaða sparingin á § 12 er 46.450.000 kr., so tað er heilt givið, at tað kemur at merkjast onkustaðni.

So var tað Essa Arge, sum nevndi um ein narkosulækna, sum skuldi setast norðuri í Klaksvík, hann meinti, hann skuldi setast í Havn, og so helt hann tað, at narkosulæknin skuldi arbeiða 2 dagar um vikuna norðuri í Klasvík og 1 suðuri í Suðuroy, nú veit eg ikki hann hevði makt til tað, um so var.

Í 1986 brúktu vit 162,7 mió.kr., tað er 8,8% av fíggjarlógini, so taka vit 1987, tá brúka vit 208,7 mió.kr., tað er 9,6% av fíggjarlógini, so kemur hetta vælsignaða árið, sum eitur 1988, nú veit eg tað, at hesi tølini eru nógv hægri, tekur man tað, sum tað skal takast í hvussu so er tað, sum er bókað inn á hasa greinina har, tá fer talið upp á 14,3%, og eg veit tað, at fíggjarlógin vísti nøkulunda tað sama, so tað er eitt yvirtrekk upp á 5% av allari fíggjarlógini á einari grein. Tá lá man so sigur, at man tekur hetta inn fyri fiskivinnuna, so trúgvi eg næstan, at man heldur skal siga tað, at man tekur hesar pengarnar inn, tí tað er yvirtrekk á fíggjarlógini 1988, t.v.s. fíggjarlógin javnvigar, tað ger hon, tí tjóðveldiskvirnan í fíggjarmálum hevur lagt so mikið væl upp fyri, at sjálvt um teir hava dansa mazurka úti í Tinganesi, so hevur tað altíð verið javnvág, og tað hevur verið avlop. So hatta har við mazurkadansinum, kann eg gott koma aftur tíl, men eg havi ikki tíð til tað í hesum samanhanginum her, tað kann so bíða.

So er tað skúlaøkið, har eru ikki so nógvar ávísar niðurskeringar, men tann samlaði niðurskurðurin har er upp á 29 mió.kr., frá 422 mió.kr. til 393 mió.kr., tað verður umleið 29 mió.kr., tað er niðurskorið har.

So er tað henda vælsignaða greinin her almanna- og heilsumál, hetta hava serliga teir smáu flokkarnir dusað sær øðiligt í, at her er so ógvuliga stórur niðurskurður. Taka vit tað fyrstu kontoina, tað er Andveikravernd og bústovnar, er hon hækkað við 2,8 mió.kr. Fólkapensi-

ónin, tað hava teir eisini verið inni á, at har var so nógv niðurskorið, hon er hækkað við 5,9 mió.kr. Hækkingar í fólka- og avlamispensiónini, har er eisini ein hækking upp á 3,5 mió.kr. So er tað nakað, sum niðurskorið er undir almanna- og heilsumálum, tað er Húsalánsgrunnurin, hann er niðurskorin við 5 mió.kr. Um vit taka ta samlaðu kontoina, so er hon upp á 820.749.000 kr. í 1989, og um vit taka komandi ár, so verður hon upp á 819.256.000 kr. Nú veit eg ikki, um hatta kemur at halda, men tað kundi kanska landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum greitt okkum frá, so man fær eitt samanhang í hetta. Tað hevur verið nógv tosað um, at tað hevur verið stórur niðurskurður á hesi greinir.

Tað, sum eg ætlaði mær inn upp á, tað er nakað heilt annað. Eg haldi eg havi nevnt tað í bløðunum, tað var í samband við hesa tvungnu uppsparingina. Nú hevur Niels Pauli serliga lagt meg undir at sagt, at eg var í móti hasum har og ætlaði ikki at taka undir við tí. Á ein hátt so ynsktu vit í Tjóðveldisflokkinum broytingar, tá ið uppskotið kom niðan í tingið frá hesari samgonguni. Men tá ið tað kom frá sjálvstýrissamgonguni, tá var einasti limur í fíggjarnevndini, sum tók undir við uppskoti landsstýrisins, tað var nevnliga eg sjálvur, eg var tann einasti. Har fóru teir saman og gjørdu eitt rossahandil ella, eg veit ikki, hvat man kallar tað fyri, Niels Pauli og Svend Aage og komu vit einum broytingaruppskoti, so tað er teir, sum eiga upprunan til hesa tvungnu uppsparingina. Tað er tann háttvirdi tinglimurin Niels Pauli Danielsen saman við Svend Aage Ellefsen.

Tá ið so Sambandsflokkurin kemur inn í samráðingarnar, so vita vit tað, at Sambandsflokkurin hevði eitt uppskot um tvungna uppsparing í undanfarnu samgongu í 1986 ella onkuntíð tá. Tá siga teir haps, vit vilja hava tvungna uppsparing, hatta var Fólkaflokkurin gingin við til. So um Tjóðveldisflokkurin vildi hava t.d. nakað at koyra víðari, ráfiskagrunnurin var tómur, tað fór eingin at fiska tey bíligu fiskasløgini aftaná, um vit ikki gjørdu nakað, tað var heilt greitt, tað fór eingin til Íslands at fiska brosmu, um vit ikki royndu at fáa hetta

upp aftur at koyra. Skuldi man játta meira pening, so mátti man eisini taka inntøkur inn, so teir eiga sjálvir hetta upprunauppskotið til hesa tvungnu uppsparingina, ið nú skal pína fólk, sum hava eina skuld upp á 1 mió.kr., tey skulu nú rinda eina tvungna uppsparing.

Hatta eri eg ikki samdur í, men fyri at fáa hetta aftur at koyra, so atkvøður man heldur fyri hasum har, og so lovaði formaður sambandsfloksins, at vit skuldu fáa broytt hetta í heyst, tí Finnbogi Ísakson hevði tað eisini á orði í tí málinum, tá ið tað varð framlagt her í tinginum við 1. viðgerð, hann meinti eisini, tað skuldi broytast, at man skuldi ikki taka tað við, men bíða til heystar, áðrenn man setti tvungna uppsparing.

Tað fyrra uppskotið, sum varð lagt niðan undir sjálvstýrissamgonguni, gekk út upp á ein eykaskatt á háinntøkum fyri komandi ár, og so var tað burtur, tá ið árið var úti, tá var ikki neyðugt at trekt tað so harðliga inn, um man kundi koyrt eitt sindur av trokkinum yvir á næsta ár.

Nú siggi eg, at tíðin gongur undan, so eg fái ikki lið at viðgera tað so gjølla, men um vit taka hesa tvungnu uppsparingina, so meti eg hana at geva óluksáliga lítið í mun til ta misnøgn, sum hon skapar.

Vit taka fyrst tann fyrsta partin, tað eru øll tey, sum hava sett búgv, skylda 1 mió.kr. og eitt lítið sindur meira ella eitt lítið sindur minni, tey hava eina tvungna uppsparing, so tað forslær. So taka vit tann næsta partin av fólki, tað er kanska 30%, tað eru tey, sum eru betri fyri, tey kanska seta eitt sindur inn kortini, so tað er ikki neyðugt hjá teimum at hava tvungna uppsparing, men nú siga tey við meg, at nú seta vit einki inn, nú fer alt inn á ta tvungnu uppsparingina, so har er einki at vinna. So taka vit tey síðslu 20%, tað eru tey, sum kanska tjena væl, kanska ikki hava tørv fyri júst at hugsa so nógv um, hvussu tey bróka sín pening, har kanska vit fáa nakrar milliónir. Og so nøkur av teimum, sum kanska ikki sova væl, um tey eiga nakrar krónur, so har kanska vit fáa 20-30 mió.kr., tað er tað heila, vit fáa burtur úr allari hesari misnøgdini. Hatta varð eisini kannað í undanfarnu samgongu, tá var Javnað-

arflokkurin so ræðuligt inn fyri tvungnari uppsparing. Vit settu tað ongantíð í verk, uppskotið var klárt at leggja niðan í tingið, tað kunnu tit gott fáa váttað frá líkningarráðnum, tað varð ongantíð sent niðan.

So er nakað annað við hesi tvungnu uppsparingini, tá ið eg kom at hugsa um ta tvungnu uppsparingina, hví skulu teir endiliga hava hana ígjøgnum eisini Niels Pauli og hansara flokkur? Hví skuldi hon koma ígjøgnum? Tað var fyri at sabotera tann samhaldsfasta, hann kemur at virka mikið betur. Vit fingu ikki feløgini, ikki láglønarfeløgini suður til Havnar at mótmæla, at stjórarnir fáa hægri skatt, um vit settu hana í gildi í staðin fyri. Hon tekur 3% av allari útgoldnari løn, tá ið hon er farin at virka fult. Í dag skulu tey, sum tjena oman fyri eitt vist mark gjalda heili 7% í tvungnari uppsparing. Eg trúgvi næstan, at um vit tóku tann samhaldsfasta og settu hann í gildi, so trúgvi eg, at hann hevði virkað mikið betur. Nú er lógin komin niðan, hon skal broytast til 1. januar 1991, tað eru vit so gingin við til, tað var eitt av teimum tungu málunum undir samráðingunum, tað var at varðveita handan grunnin, ti Javnaðarflokkurin var eisini lopin fyri borð við allari síni ábyrgd, hann kundi gott bara lata hetta fara og koldur sita og polarisera við Fólkaflokkinum. Men tá ið vit fara oman í fíggjarnevndina, tá síggja vit ongantíð so samdar menn.

Eitt mál var fyri nú í fíggjarnevndini upp á 4 mió.kr. fyri bara at nevna eitt dømi, eg skal ikki nevna, hvør tað var. Har var ikki brúk fyri tjóðveldisatkvøðunum fyri at fáa tað málið ígjøgnum, har vóru Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin sera, sera samdir.

Nú er tíðin farin, so eg kanska fái eina viðmerking, um Lasse Klein kemur upp her.

<u>Tordur Niclasen</u> (kff.) viðmerking

Kærra formaður.

Nú hevur Heini O. Heinesen skírt Javnaðarflokkin fyri at dansa mazurka úti í Tinganesi. Javnaðarflokkurin

hevur skírt Heina O. Heinesen fyri at dansa samba, men eg má siga tað uttan at hava nógv innlit inn í dans, at tá ið eg var ungur ella rættari sagt, tá ið eg var yngri, tá kallaði man nakað at dansa jenka, tað var hetta at fara trý stig fram og tvey aftur, og júst soleiðis fyrikemur mær tað, at Heini O. Heinesen ger viðvíkjandi inntøkulógunum. Hann dansar jenka í samband við inntøkulógirnar. Hann hevur fyrst verið uppi einaferð, tá ið tað var til viðgerðar, og sagt, hann tók ikki undir við teimum, so fer tað í nevnd, álitið kemur aftur úr fíggjarnevndini, hvør er við til at mæla til, at uppskot landsstýrisins kemur í gjøgnum? Tað er Heini O. Heinesen. Nú nýliga hevur mynd av honum saman við grein verið í 14. september, har hann rú ásannar, hetta er ógagnligt serliga tí, tað er ein bólkur í okkara samfelag, serliga tey, sum byggja hús og hava stór lán, at tey verða órímiliga hart rakt, júst tað, sum vit sjálvir í Kristiliga fólkaflokkinum hava vist á. Men aftur nú í dag hevur hann broytt støðu, tað er eitt jenkadansarí uttan líka í samband við hetta.

Harra formaður, Sannleikin og veruleikin er tann, at umframt at hava lagt eykaskatt, kalli tað bundin uppsparing, um tit vilja, fer Heini O. Heinesen nú í nærmastu framtíð eisini at leggja henda her sambalds-fasta eftirlønargrunnin oman á arbeiðaran, t.v.s., hann verður tyngdur meira enn nakrantíð.

Niels Pauli Danielsen (kffff) viðmerking

Harra formaður.

Ta var Heini O. Heinesen, mín góði vinur og hátvirdi tinglimur, sum hevur so ógvuliga ilt av tí, at hann hevur atkvøtt fyri hesari bundnu uppsparingini, men tað hevur hann also gjørt, hann sleppur ikki undan sínum gerningum, tað er nú einaferð soleiðis. Sjálvt um tað pínir hann, so noyðast vit at minna hann á, at tað hevur hann gjørt, og so segði hann, at tað var neyðugt, tí eingin var at fiska tey biligu fiskasløgini. Eingin var at fara út og fiska tann fisk, sum ikki kann fiskast uttan, at landskassin rindar fyri, at hann verður fisk-

aður.

Eg kom í tankar um eitt, og eg haldi, at samgongan og ikki bara Heini O. Heinesen, men øll samgongan, sum hon er harra formaður, átti at tari og hugsa, um tað ikki var eitt hugskot at minka um hetta talið av skipum, sum fiska henda bíliga fisk, sum landskassin má rinda fyri.

Eg haldi, at landskassin, samgongan og Heini O. Heinesen og allir samlir skulu taka og hugsa, um tað ikki var eitt hugskot at fara undir at minka hetta her heldur enn at díkja fólkið undir í inntøkuskatti og tolli fyri at fáa nakrar av hesum fiskunum upp.

Lasse Klein (sj) viðmerking

Harra formaður.

Tað er háttvirdi tingmaður Heini O. Heinesen, tín góði vinur, sum kemur fram við hesum aftur, um hetta her yvirtrekkið, og eg føli meg líka sum noyddan til at svara aftur, tí at støðan er jú tann, at á roknskapinum, sum landsverkfrøðingurin hevur kunngjørt í fylgiskjølunum til figgjarlógina, har stendur greitt og týðuliga, at fyri 1988 hevur stovnurin brúkt 342,4 mió.kr. Fyri 1988 vórðu avsettar á figgjarlógaruppskotinum 279 mió.kr. og umfram tað, so avlop landskassans fyri 1988 50 mió.kr. eisini lagdar afturat, t.v.s. 329 mió.kr.

Tað er rætt, tað eru smáar 13 mió.kr. í yvirtrekk fyri 1988. Taka vit tíðarskeiðið frá 1979-80 og so tey árini fram til 1984-85, so siggja vit á somu konto, at Fólkaflokkurin hevur yvirtrekt samferðslumálini § 13 við næstan 75 mió.kr. Tað er bara ein samanbering, men vit eru fyri so vítt eg og Heini O. Heinesen ikki so øðiliga ósamdir, tí at niðurskurðurin á § 13 er alt ov stórur, og tað kemur eisini soleiðis, sum vit hava boðað frá, at føra við sær eitt rættiliga stórt arbeiðsloysi, so eg skal ikki koma nærri inn á teir spurningarnar.

Vilhelm Johannesen (jv) viðmerking

Harra formaður.

Tað var ein stutt viðmerking til háttvirda løgtingsmann Heina O. Heinesen. Hann nevndi her í endanum av síni røðu, at Javnaðarflokkurin var lopin yvir bord, og hetta er tað sama, sum Tjóðveldisflokkurin hevur roynt nú í langa tíð at billa inn í fólk, at sloppið sær undan ábyrgdini, Javnaðarflokkurin vildi ikki aftur í landsstýrið. Men eg fari at minna á, at Javnaðarflokkurin longu valkvøldið peikaði á eina møguleika, eina samgongumøguleika í millum Tjóðveldisflokkin, Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin.

Hetta vildi Tjóðveldisflokkurin ikki uttan so, at Sambandsflokkurin gekk við til allar møguligar yvirtøkur, og tað skuldi Javnaðarflokkurin syrgja fyri, at Sambandsflokkurin gjørdi.

Vit vistu, hvat tað er at samarbeiða við Fólkaflokkin, vit kendu arbeiðshættin hjá Óla Breckmann, vit vistu, hvussu arbeiðsumhvørvið fór at verða, og tí søgdu vit nei til ta samgonguna, sum Tjóðveldisflokkurin vildi hava okkum í.

Hvat hava vit so upplivað nú í seinastuni? Jú, Sigrar Hansen lýsti eitt politiskt verkfall, hann niðurlegði løgtingsarbeiðið og alt politiskt arbeiði, tí teir skuldu fáa greiði á hesum, um Óli Breckmann kundi halda uppat at skriva, sum hann gjørdi. Tann seinasti, sum hevur sagt nakað alment í hesum máli, tað er Heini O. Heinesen sjálvur. Hann hevur sagt alment, at hann finnur seg ikki í hesum longur, um Óli Breckmann heldur fram, so er hann ikki við í samgonguni meira, og tá situr Heini O. Heinesen har, sum Javnaðarflokkurin og av somu orsøk.

Heini O. Heinesen (tf) viðmerking

Harra formaður.

Nú veit eg ikki, hvønn eg skal taka fyrst, men tá ið eg skal vera púra ærligur, so hava vit verið í so nógvum samráðingum, og kann eg gott upplýsa Vilhelm Johannesen tað, at eg rokni við, at vit høvdu fingið nógv størri semju millum Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin enn millum hitt alternativið, sum tú tosar um.

Tað er ikki Atli Dam, sum skal avgera, hvørja samgongu, vit fara í. Tit hava rikið okkum av spott við hesi samgonguni, tí vit eru gingnir í eitt samarbeiði við Sambandsflokkin, vit hav ikki sæð nakað annað í Sosialinum. Tað var kanska tað, sum tit ætlaðu okkum. Eg dugi sostatt ikki at siggja logikkin í hasum.

Niels Pauli tosar um, at vit skuldu bara lagt øll tey skipini, sum fiska bílig fiskasløg. Eg spyrji Niels Paula, um vit skuldu lagt hansara skip, harn átti fleiri skip sum landsstýrismaður í familjumálum í undanfarnu samgongu. Vit hava fleiri av teimum í Klaksvík, tey hava fiskað brosmu í Íslandi, skulu tey ikki fara yvir aftur? Vit vita tað, at tey hava fiskað og manningin hevur havt hampiliga inntøku við at lata ein stuðning til hetta, og fólkið hevur fingið arbeiði á landi. So var hann er og segði, at eg var ikki fyri hesum. Eg var greiður yvir tað, at vit vóru noyddir at taka pening inn. Tá ið hann er uppruni til hesa tvungnu uppsparingina, les álitið, tað er 10 síður ella meira, tað er næstan sum ein hálv bíbil hjá presti, ið hvussu so líka langt sum ein lestur, tað eru teir báðir samdir um hann og Svend Aage. Bara fyri at sabotera tað uppskotið, sum landsstýrið legði fram, tað hevði kanska verið meiriluti í tinginum fyri tí, um tit høvdu tikið undir við landsstýrinum, tit tóku ikki undir við landsstýrinum.

Tað eru tit, sum eiga uppskotið til tvungna uppsparing, tað er tann kristiligi flokkurin í figgjarnevndini og Fólkaflokkurin, tað eru tit, sum eiga tað, og Sambandsflokkurin sigur haps, nú er okkara uppskot komið fram, og allir eru gingnir við til tað, tað er tað, sum tað gongur út uppá.

<u>Niels Pauli Danielsen</u> (kfff.) viðmerking

Harra formaður,

Stutt til Heina O. Heinesen. Eg eigi eingi skip, sum fiska nakran djúpvatnsfisk og fyri tað næsta, var tað ikki tað, sum eg segði, at tú skalt leggja øll hesi skipini, tað skalt tú sjálvandi ikki, men tú skalt minka um talið, minka um trýstið á Føroyagrunninum, serliga tá

ið tað er landskassin og arbeiðarin og fiskimaðurin, tí teir fáa ikki meira burtur úr tí, teir verða eisini pløgdir av í inntøkuskatti, fiskimenninir. Men tað eru hesir, sum eiga hesi skipini, sum bara kunnu fáa sær fleiri tí at landskassin betalur tað um tit ikki kundu hugsa um, at minka um hetta tali, tikið ein ella tveir ella tríggjar djúpvatnstrolarir út, tað var tað sum eg legði Heina O. Heinesen til ráð. So vil eg til seinast siga, at vit eiga einki uppskot sum landsstýrissamgongan hevur lagt fram her, tað er tað klárt, at vit eiga ikki nakað uppskot. Vit eru ein flokkur upp á 2 tinglimir, vit kunnu ikki hava skyldina fyri tað sum 21 tinglimir hava gjørt her í tinginum, tað skilir Heini O. Heinesen eisini og hann haldi eg skal gerast vaksin, harra formaður, og taka ábyrgdina av hesum uppskotunum um bundna uppsparing, hann og hansara menn eiga tað.

Heini O. Heinesen (tf.) viðmerking

Tað var líka ein viðmerking aftrat til Niels Pauli Danielsen, vit taka ábyrgd fyri hesum her, vit hava stemma fyri hesum uppskotinum, vit taka ábyrgd fyri hesum uppskotum, tað skal tú ikki verða bangin fyri, tí tað gera vit. Men tú skal taka ábyrgd fyri teimum skipum sum tú kempaði igjøgnum úti í Tínganesi meðan tú sæt sum landsstýrismaður í familjumálum. Tey kosta eisini pening, tey skulu eisini fíggjast og teir skulu eisini hava av hesum peninginum teir, sum tú kempaði fyri. Eg vil siggja teir menninar um teir ikki fáa tann studning sum hesi fiskasløgini skulu hava. Brosma er ikki djúpvatnsfiskur, tað veit og einki um at siga. Tá man fer nærri at landi, so plagar man at fáa brosmu.

So var tað Lasse Klein, sum var inni á hesum yvirtrekkinum á fíggjarlógini, men eg kundi gott hugsa mær at spurt hann einaferð aftrat, eg havi spurt hann fyrr her í tingsalinum hvussu tað ber til, at landsverkfrøðingurin hevur keypt skrottlagri hjá Fureholmen til undirsjóvartunnulin. Teir hava brúkt líka nógvar pengar at fyrireika arbeiðið við undirsjóvartunnulin vestur í Vágar, sum tað kostaði at bora 3 km. av bergholinum

norði í Kunoynni.

Henrik Old (jv.)

Harra formaður.

Nú verður tað nokk sum ketta upp úr høvdatroði aftan á hetta her. Men við hesi viðgerðini so eru tað nakrir tingmenn sum hava fört fram. Ja, fyrst vil eg siga til Heina O. Heinesen, hann tosar um at brosma ikki er djúpvatnsfiskur, tað havi eg í hvørtfall ikki upplivað, at man ikki hevur roknað brosmu sum djúpvatnsfisk, tað kundi kanska verið tarabrosma, sum ikki var djúpvatnsfiskur, men brosma hevur vanliga gingið undir fyri at verið heldur niðaliga, teir plagdu at taka til tá teir tóru út av kantinum so var tað ber brosma, so at hon skal verða komin uppeftir nú tá ið Heini O. Heinesen er komin í samgongu aftur, tað ivist eg eitt sindur í, men lat tað fara.

Onkrir menn hava verið inni á, at man skuldi havt hesar viðgerðirnar skildar sundur, soleiðis, at løgmansrøðan og fíggjarlógin vóru hvørt í sær. Tað hevði ikki verið av leið, tí bæði hesi høvdu verið nakað at tosa um. Man kundi sjálvandi gjørt sum formaðurin í Sambandsflokkinum Pauli Ellefsen, hann gjørdi skjótt av við løgmansrøðuna og tosaði bara um fíggjarlógina. Hann segði í stuttum, at løgmansrøðan tað var einki at tosa um, har var einki, so var tað yvirstaðið. So svartskygdur vil og heldur ikki verða, sjálvt um vít eru í andstøðu, so vil eg ikki siga, at einki var í løgmansrøðuni sum tosast skal um. Sjálvandi er tað tað og tað eru nøkur ting nevnd har, um tey koma at virka, so verða tey til frama fyri okkum øll. M.a. verður nevnt um at býta ráðvøru millum virkini og keypa ráðvøru frá útlondunum til fiskavirkini. Vit minnast lívið sum var í síðstu samgongu tá hetta kom upp á tal, Óli Breckmann leyp frá, Kristiligi Fólkaflokkurin sum stungnir grísar, tí nú skuldi man draga russarar inn á land og hvør av sínum, so tað kom ikki nakað burtur úr tí.

Á fyrstu síðu í løgmansrøðuni, so sigur løgmaður, at nýggja samgongan ásannar, at fíggjarliga gongdin og

støðan í samfelagnum krevur at framd verða nógv ymisk og heilt serlig tiltøk, hetta hava menn nevnt fyrr í dag og í gjár og ikki kann annað sigast, enn at heilt serlig tiltøk eru sett í verk. Hetta eru ikki nakrar vanligar lógir sum gera onkrar smábroytingar her og der, men tiltøk sum grípa inn í hvørt húsarhald í landinum ja, tiltøk sum endavenda tilveruni hjá summum fólkum og ikki so fáum. Vit minnast, tá núverandi løgmaður var í andstøðu, hvussu harðliga hann fanst at okkum, tí vit settu lógir í gildi við afturvirkandi kraft, onkrar av teimum vóru upp til eina viku og summar vóru bara 1 og 2 dagar afturvirkandi. Jógvan Sundstein segði, at tað var brot á fólkastýrið, tað var brot á demokratiið at man setti lógir í gildi við afturvirkandi kraft. Nú upplivdu vit so tað, at lógir blivu settar í gildi av somu monnum við meir enn einum hálvum ári við afturvirkandi kraft. Í nógvum førum, so hava fólk lagt eina ætlan fyri árið, peningastovnarnir hava eisini bjóðað seg fram fyri nógv, at leggja ætlanir. Hetta hevur endavent øllum, um hetta ikki kann kallast brot á fólkaræði fyri at bróka Sundsteins egnu orð, so haldi eg, at tað er eitt sindur løgið. Tá ið Fólkaflokkurin sat i andstøðu, so spældu teir eina plátu og hon bleiv ofta spæld inni her, niðurlagið var: Minni skatt, minni toll. Nú hendi tað, at Fólkaflokkurin kom i Tinganes og nú vóru tað fleiri sum vóru spent upp á, hvussu plátan nú fór at ljóða, lagið tað bleiv tað sama, men niðurlagið tað er, meira skatt og meira toll. Hetta vóru teir sum undan valinum rópti um, at teir skuldu loysa allar trupulleikar og aftrat so skuldi skatturin niður. Vit aðrir vit vóru meir varnir og tordu ikki at lova. Bara Javnaðarflokkinum men aðrir flokkar eisini, teir tordu ikki at lova tað, at skatturin skuldi niður, men man helt seg til at siga, at man kundi hildi skattin á sama støði.

Í eini skemtisending í sjónvarpinum i vár sum rópt bleiv tyri Kjørbreyt, har hevði sjónvarpi fingið løgmann at koma og tosa við nakrar arbeiðsmenn í einum kaffiskúri eg haldi at tað var við Leynavatn. Har spurdu arbeiðsmenninir løgmann um mangt og hvat, um uttanlandsskuld, um lánir og hvørt av sínum, men løgmaður endaði

fleiri ferðir við at forsikra hesar menninar um, at skattur og tollur skuldu ikki upp, undir nøkrum umstøðum. Man má viðganga, at tiltøkini ið tann fyrra samgongan sum kollsigldi í vár, teir ætlaðu at seta í verk, tey vóru munin minari og hevði ikki rakt tey við vanligari inntøku so meint sum tað sum nú kom burtur úr nú ið Pauli Ellefsen er komin uppí. Tá var talan um eitt mark upp á 200.000 kr. fyri uppsparingina. Tá ið sambandið kom upp í, tá fingið teir drigið Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin niður á eitt mark upp á 110.000 kr. men vit hoyrdu í gjár Paula Ellefsen fyri, at nógv fólk høvdu hervent sær til hann um hesa uppsparingina at tey vóru komin tvørt fyri, og hann hevði kanna málið og eingin av teimum náddi hetta markið upp á 110.000 kr. Tey eru væl útvald um Pauli Ellefsen hevur møtt nógvum fólkum sum ikki koma á hetta markið fyri eitt ár upp á 110.000 kr. Tað má man siga, at tey standa ikki væl í tí tá árið er enda. Trýr man veruliga, at tey sum skulu gjalda hús ella tey sum skulu byggja hava nakað at spara av aftan á, at henda samgongan hevur álagt teimum eina eyka byrðu upp á úti við einar 15.000 kr. Tað er ikki fyrstu ferð at Pauli Ellefsen skrivar og at tað einki hevur við veruleikan at gera, men fyri einaferð skyld, so hava allir føroyingar sæð í Dimmu, tað roknistykki sum Pauli Ellefsen hevur sett upp í Dimmu, at tey einki hava við veruleikan at gera. Øll hava á sínum egna kroppi upplivað nakað heilt annað. Teir hava eisini roynt her at burturforklára veruleikan, tað at fólk við vanligari løn verða trekt meir enn helvtina, fiskimenn fáa útgoldi ein triðing, hava teir havt ein góðan túr, so fáa teir útgoldi ein triðing. Eg trúgvi ikki, at tað kann verða serliga stuttligt. Nú hoyrdi man um, at skip eru komin eystanífrá við einum góðum túri, at teir menninir trúgvi eg ikki verða glaðir fyri at bara fáa ein triðing av tí sum teir hava fingið fyri túrin. Enn tá arbeiðsfólk sum bara hava ein dag á útbetalingskontórinum eru trekt fyri 50%. Onkur í samgonguni uggar seg við at tað eru hægri skattir í Noreg, Svøríki og Danmark. Tað er lítil troyst í tí, ti allir hava ásannað at hesi londini eru gingin ov langt og teir hava stríðst nú

í nøkur ár, við at fara hin vegin aftur, tí ein hevur varnast tað, at hetta við at skatta fólk út í tað óendaliga, tað er eingin loysn, tí er tað væl skiljandi, at Sambandsflokkurin ikki vildi hava Javnaðarflokkin við í eina samgongu, tí hatta við 110.000 kr. markinum, hatta høvdu vit so undir ongum umstøðum kunna gingið við til. Eg haldi, at Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava latið seg lokka at loypa fram av í hasum føri. So oman á, at siga, at fólk fáa pengarnar aftur tá ið tey eru 65 ára gomul. Eg haldi, at um tað er nakar partur av lívinum hvar man serliga hevur brúk fyri pengum, fyri øllum tí ið man tjenar, so er tað tá ið man er í ferð við at byggja sær hús. Eg haldi ikki, at tey sum byggja kunnu dreyma um, at spara upp, tí tey hava brúk fyri hvørjari tjentari krónu, um tey skulu behalda tak yvir høvdið. Og har til til er steinur lagdur oman á byrðu við tollhækkingum. Eg haldi, at vit í síðstu samgongu tóku nokk inn í skatti og vit vóru í tí støðu, at fiskaprísurin hann fall alla tíðina, so man var í perganeyð og í neyð við stuðli til at halda prísin uppi við í heili 2 ár. Men, eg vil ikki gera tað so ringt sum Pauli Ellefsen og aðrir úr Fólkaflokkinu hava gjørt støðuna, at tað bleiv lagt so mikið upp fyri í góðari tíð og tað skal Jóngerð Purkhús eisini hava æruna av, saman við okkum øðrum sum vóru við í samgonguna, tað var ikki bara at blaka út í leysa luft sum teir sum eru saman við Tjóðveldisflokkinum nú í samgongu. Tað er soleiðis at tíðin frá nú av og til jólar, hon hevur mangan roynst illa fyri veður og tiskaríði hevur oftа verið har eftir og tað sær út til, at hetta heysti byrjar við sama lagi. Tað hevur ført við sær, at arbeiðið á flakavirkjunum hevur verið lítið og tað er longu byrja at halta fleiri staðir alvorliga og tí verður tað dupult so tungt hjá teimum sum nú skulu gjalda hesa uppsparingina alla verða trekt fyri hana aftrat tollhækkingini. Tí verri merkist hesin politikkurin longu millum fólk, serliga hjá tímaløntum og løntakarum og vit hoyrdu Jóngerð Purkhús siga, at strandfaraskipini skulu sigla í mest møguligan mun, fyri at fólk ikki skulu verða uppsøgd, men vit vita longu, at

tað eru nokk so fitt av fólki blivin uppsøgd hjá Strandferðsluni. Sama er galdandi hjá tímaløntum hjá landsverkfrøðinginum, aftur har verða fólk søgt upp, tí tað skal skerast niður. Har fer ávirkanin mest at gera seg galdandi út á bygdunum. Tað hevur mangan verið hent við vegastubbum her og der um veturin, tá ið veður ikki hevur verið til útróður ella til annað og eisini hjá teimum sum upplagstir eru og ikki kunnu fara til skips longur, tí heilsan og annað er farið at bila, at teir so hava havt hetta at tríva í. Hesir skulu nú, til at togast um teir tímarnir sum eru ov lítið av til onnur framanundan. Tá ið man frá politiskar síðu slær brensurnar so kraftiga í samtíðis sum at bankarnir eisini tátta í, so kann tað ikki annað enn fáa arbeiðsloysi við sær. Um man hyggir efti tí sum er játtað til hetta við vegastubbum, so siggja vit, at tað eru avsettar 3 mió.kr. í tí sum man kann finna í viðmerkingunum. Har er til at siga, at viðmerkingarnar tað er tað frægasta sum er av viðmerkingum, tað er tað sum er frá landsverkfrøðinginum, hitt skal eg geva Jógvan Durhuus rætt í at tað er rættiliga fløkjasligt og í summum førum vónleyst at finna út av hvat meint er. Men har eru nógv økir roknaði upp sum hesar 3 mió.kr. skulu strekkjast til, tað eru vegastrekkir Tvørovri/Øravík, Vág/Lopra, Sandi, Miðvági, Kirkjubø, Eið, Funningi, Skipanesi, Skála, Strondum, Klaksvík, Múla, hetta skulu hesar 3 mió.kr. tambast út til og tað er klárt, at her verður at tátta í so tað forslær, tað verður hvørki til lastbilar, ei heldur hesar tiltiknu trillubørðurnar sum Sambandsflokkurin í síni tí tosaði so nógv um. Eitt er, at hava so nógv arbeiði, at vit ikki klára tað sjálvir og so at sláa so ógvusliga í sum her er gjørt. Vit minnast fíggjarmálaráðharran í síni tíð, tá ið hann var formaður í SEV stýrinum hvussu harðliga bleiv lagt eftir okkum sum vóru í seinastu samgongu serliga í byrjanini av samgonguni fyrst í 1985, tí, at tað vóru nakrir menn sum meinti, at útbyggingin hjá SEV kundi tálmast eitt lítið sindur og ikki var neyðugt at pressa so nógv á t.d. við útbyggingini norði á Eiði, soleiðis at flakavirkið og skipini blivu avmannaði. Men hetta var nærmast ógjørligt, tí tann eini

flokkurin í samgonguni ella báðir teir smáu flokkarnir teir løgdu seg skerflatar fyri at SEV kundi halda á, uttan at tað kundi tálmast upp á nakran máta. Tað er ikki rætt, at bremsað so hart upp, at man kemur í tað støðu, sum var í 50unum tá ið fólk máttu fara av landinum fyri at vinna pengar. Vit siggja í Danmark, at Schlüter hevur roynt hetta og fyri nøkrum fáum døgum síðan, so sá man úrslitið í sjónvarpinum, at danskarnir fara í stóran stíl yvir til Svøriki at finna sær arbeiði.

Eitt annað er skipasmiðubyggingin. Vit eru, tíverri fyri fystu ferð í tí støðu, at einki skip er í ger í landinum. Á Tórshavnar skipasmiðu er tað fyrstu ferð í 30 ár søgdu teir nú, at einki skip var í ger. Pauli Ellefsen nevndi, at tað vóru polakkar sum stóðu fyri allari skipabyggingini, tað er ikki rætt, tað vóru kanska nakrir upp í, men tað er betur at man hevur havt nakrar polakkar enn tað støðu sum man tú er komin í, at eingin av føroyingunum skal hava arbeiði við skipabygging, tað kann so ikki verða tann rætti vegurin at ganga. Tað kann henda, at um man ikki fer aftur gongd við tað, so hevur man brúk fyri polakkum tá ið man so einaferð skal byrja aftur. Eg nevði eir heilan deil aftrat, men tað var mest til Jógvan Olsen og Anfinn Kallsberg á fiskivinnuøkinum, men tá ið teir ikki eru til staðar her so haldi eg, at eg bíði við tí og biði um orðið seinni.

Pauli Ellefsen (sb.)

Tá ið Henrik Old sigur, at mítt roknistykki í Dimmalætting ikki passar, ja, tað er bara soleiðis, tað stendur í lógini sama dag í Dimmalætting og tað stemmar. So stendur Henrik Old her og grætur rossatár yvir, at vit ikki hava kontraktir á føroyskum skipasmiðum, hví? Tí at Javnaðarflokkurin í seinasta valskeiði skipaði fyri milliarda bygging av fiskiskipum í Noreg. Ein politikkur sum var beint í mótstríð við tann politik sum vit róku frá 1981-1984 har vit søgdu, tey skip sum vit byggja tey byggja vit sjálvi. Ní hava vit bygt fyri

milliardir í Noreg og tað er fyst og fremst tí, at tað er torført at fáa kontraktir á føroyskar skipasmiðir, men tað skal sigast at eg meini, at vit skulu umhugsa hatta har og fáa nakað av gongd, men tað hevði verið ólíka lættari um Javnaðarflokkurin hevði víst eitt lítið sindur av ábyrgd og fylgt okkara ávísinum frá 1980-1984 og latið verið við at bygt fyri milliardir í Noreg.

Hergeir Nielsen (Lf.) viðmerking

Harra formaður.

Tað skulu verða nøkur fá orð til Henrik Old. Hann hevði so ógvuliga ilt av, at tað blivu løgd hægri gjøld á inntøkur niður í móti 110.000 kr. og hann eisini ógvuliga ilt av, at teir ið sigldu við skipunum eystanfyri eisini fingu meir at gjalda til landskassan. Sostatt harmaðist hann um, at man í heila tikið legði hægri gjøld á. Eg vísti á tað sum eg segði í gjár, at hetta hevur verið nakað sum Javnaðarflokkurin hevur verið sera raskur at gera saman við okkum øðrum, tá ið tung tøk skulu takast, men líka so raskur sum Javnaðarflokkurin hevur verið til tað tá at gera tað rætta, líka so raskur er hann í dag, at billa allari arbeiðarørsluni inn, at tað sum man ger nú í tí størstu kreppuni nakrantíð at tað er blóðskeivt. Nú forfylgir man teimum, nú koyrir man tey á húsagang o.s.fr. Nú hevur man nátt markið fyri tað sum tey tola, hetta ger Javnaðarflokkurin seg til dómara yvir. Men so kemur tað fína, og tað er har ið tað logiska brestir, tí aftan á, at Henrik Old letst at gráta rossatár yvir, at vit noydast at heinta pengar inn í landskassan, fyri at hava virkir og skip gangandi, so grætur hann um, at landsverkfrøðingurin ikki fekk meir pengar, at flakavirkini ikki fáa pengar, tí har eru fólk í fer við at blíva arbeiðsleys, hvar skulu pengarnir koma frá? Hetta er ein spurningur um logik og mangt annað.

Henrik Old (Jv.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var til Pauli Ellefsen, tað við tvungnari uppsparing. Tað er ein veruleiki, so kann man rópa tað fyri eitt ella annað at tey fáa tað aftur tá ið tey eru 65 ár, tey sum klára at knógva so leingi, men øll fólk sum hava havt eina inntøku hesa tíðina, tey hava merkt tað og og ikki minst tey sum hava havt cina ójavna inntøku. Tá ið Hergeir Nielsen kemur inn við at leggja gjald á, og at Javnaðarflokkurin hevur gjørt tað, tað er púra rætt, tað er eingin ivi um at vit hava verið við til hetta her, men fyri tann skyld má man vísa á, at tað er økomi yvir um tað sum fólk kunnu klára, hetta er ikki nakað man nýtist at bilja arbeiðarafjøldini inn, øll hava merkt hetta upp á sín egna kropp og tað er heldur ikki neyðugt við rossatárum, hetta er bara veruleiki og tá ið eg einaferð fái króði aftur, so kann eg siga tað har sum eg kundi hugsa mær at man hevði sparingar og tað er rættiliga stóran stíl, tá ið man hevur gjørt sparingar á fíggjarlógini, tað skal eingin verða bangin fyri tí, at vit skulu ganga við til at spara og tað eru nógvar sneisir, m.a. eru tveir handilsskúlar í gerð, tað skal pressast á at gera handilsskúla í Fuglafirði og arbeiðast yvirtíð, tí hann er í ringum umstøðum og tí skal koyrast ekstra nógv á, fyri at fáa tann á Kambsdali liðugan aftrat at vit hava ein her úti. Um man hyggur eftir hvussu tað er á øðrum økjum, so var eitt dømi í sjónvarpinum nú hvar motorpassaraskeið byrjaði, hvar ein næmingur hevði meldað seg til, og í hinum stendur man í kø fyri at sleppa fram at.

Pauli Ellefsen tosar um byggingina á føroysku skipasmiðunum. Vit bygdu øll árini á føroyskum skipasmiðum, kanska var tað bygd í so nógv, tað er møguligt, men har frá og so til at siga, at tað er steðga við bygging tað er eitt langt lop.

Jóngerð Purkhús (tf.)

Harra formaður.

Nú bæði løgmansrøðan og fíggjarlógin eru til umrøðu er kanska ikki so undarligt, at tað verður sveima nakað víða.

Vit hava eisini fingið eitt nýtt landsstýri og tað er kanska heldur ikki so løgið at onkur hevur nakað trupult við at venja seg til, at ein ikki longur er í andstøðu ella umvent, men óført hevur verið líkið til higartil, hvør hevur skylduna av hesum og hasum og tann alt eigandi yvirdrivna negativa umrøða av øllum ið fer fram í okkara samfelag og sum hevur rátt á tí politiska viðvøllinum síðan valstríði byrjaði fyri næstum einum ári síðan vísir seg tíverri eisini at merkja hetta orðaskifti. Men vónandi verður hetta orðaskifti ið verða útvarpað, endaboresturin í so náta, so vit fáa eitt sakligt orðaskifti um øll okkara viðurskifti framoftir. Í hesum landsstýrinum umsiti eg m.a. samferðslunálini sum er eitt av teimum tungu útreiðsluøkjunum í okkara samfelag. Eg skal siga eitt sindur um tað. Tað eru farnar ógvuliga stórar útbyggingar fram tey seinastu árini á samferðsluøkinum, vit hava bygt havnir, lendingar og alt vegakervið sum tað er við brúgvum og bergholum. Vit mugu ásannað at vit við hesi útbygging saman við øktari strandferðslu hava fingið møguleikar í okkara samfelag, sum vit ikki høvdu droymt um fyri 25-30 árum síðan. Okkara land er ikki til at kenna aftur at arbeiða og liva í, men tað hevur verið kostnaðarmikið og kravt nógv av okkara orku og kanska hava vit gingið nakað skjótt fram. Tað er náttúrligt, at nýgerðir koma at krevja ein minni part, men tað verður viðlíkahaldið sum kemur at taka ein stærri part av tí peningi sum vit koma at nýta á hesum økið. Eg vil leggja stóran dent á, nú vit sum heild hava fingið eitt ógvuliga gott vegakervi, sjálvt um okkurt kann peikast á onkustaðni. At vit røkja tað sum vit hava og tað sum vit hava brúkt so nógva orku upp á at bygt upp, tí gera vit ikki tað, so koma við at taka burtur av teimum gjørdu íløgunum og so noyast vit at byrja av nýggjum um nøkur ár. Hetta kann koma at verða okkum dýrt og tí fari eg eisini at biðja fíggjarnevndina hetta í geyma tá ið teir viðgera fíggjarlógaruppskotið. Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1990 eru skornar umleið 45 mió.kr. av samferðslukontoini samanborið við 1989 og tað haldi eg, at vit kunnu liva við, serliga tá ið vit ikki hava hoyrt annað hesi

seinastu árini enn hvussu nógv arbeiði hevur verið í gerð og rætt er, at í okkara landi at hava 3 bergholi í gerð í senn, tað er ov nógv. Skerjingarnar í 1990. tær koma at ganga út yvir nýgerðir og her undir tey bæði bergholini sum eru í gerð, her steðgar arbeiði ikki, men verður munandi minni. Tað var Henrik Old sum nevndi, at tað vóru bara 3 mió.kr. til nýgerð av vegum runt um landi og eg fari at umskylda hann, at hann ikki lesur bara hasar 3 mió.kr. tí tær standa í viðmerkingunum frá landsverkfrøðinginum, men aftan á, at vit høvdu fingið hasi tølini frá landsverkfrøðinginum oman í Tinganes, so hækkaðu vit
játtanina til landsverkfrøðingin við 10 mió.kr. so hatta tali er upp á 13 mió.kr. men eg vil geva Henrik Old rætt í, at hatta framgongur ikki av viðmerkingunum ið hvussu so er ikki tíðiliga. Til strandferðsluna eru játtaðar 35 mió.kr. tað er eisini nakað minni, enn tað var fyri 1989, men soleiðis sum tað sær út í løtini, so vóni eg, at vit við hesi upphædd á fíggjarlógini kunnu halda nøkulunda sama tænastustøði sum í dag. Vit arbeiða ikki við at privatisera hvørja ferju sum eg hoyrdi nú ein dagin, men við rationalisera stovnin. Hetta vóru so tølini á fíggajrlógini, men áðrenn eg sleppi vegakerv·
inum so skal eg nevna, at vit brúka óhugnaliga stórar upphæddir til ferðsluna. Nú umsiti eg eisini ferðslulóg-
ini og eg havi ikki arbeitt so nógv við hesum málsøkinum fyrr í detaljum og tað er í hesi stutti tíðini eg havi umsitið hetta mál, at eg eri komin fram á skelkandi tøl, tí tølini vísa seg ikki á fíggjarlógini men í samfelags-
búskapinum í heild er hetta ein kleppur. Í Føroyum eru skrásett umleið 20.000 aktør og virði á tí sum koyrir á teimum føroysku vegunum í dag tað verður mett til umleið 2 mia.kr. Í 1988, tá rindaði tryggingin 88 mió.kr. fyri skaðar á teimum føroysku vegunum, tá er ikki rokna í tey veldugu tøl ið koma til sjóndar á sjúkrahúsøkinum ella almanna økinum tá persónskaði hendir og heldur ikki ber til, at gera upp tað sorg og bakkast í heilar familjur verða fyri, tá tey verða rakt av deyða ella álvarsligum skaða. Tað er einki sum eitur, her má leggjast eitt stórt arbeiði ið hvussu ein skal gera tað, tað eri eg

ikki før fyri at siga í løtini og eg havi engan hoyrt, sum hevur seg hava tað einastu røttu loysnuna, men tað ber ikki til, at _ata sum einki og tí vil eg royna at gera hvat eg kann fyri at hjálpa upp á støðuna.

Harra formaður. Her er sagt so nógv í dag, og man skuldi kanska ikki svara til alt og tað skal eg heldur ikki gera, men man kann heldur ikki lata alt fara ósvarað aftur við borðinum sum sagt er. Her standa menn uppi á talarastólinum og tosa um, at fíggjarlógin er tvífaldað seinastu 4 árini, o.k. tað kann hon verða í tølum, men tað eru ikki útreiðslurnar sum soleiðis sum eru tvífaldaðar, hetta er fullkomiliga burturvið, men tað er ein roynd, at billa fólki nakað inn, sum einki hevur við
veruleikan at gera og lurtarin hevur líkiligan kjans at kontrollera, um tað er rætt. Fíggjarlógin er nevvan dagligur lestur hjá fólki sum heild,"så går den så går den", men fyri 4 árum síðan, tá stóð bara ein partur av útreiðslunum av okkara samfelag á føroysku fíggjarlógini, so fíggjarlógini kom til at siggja heilt øðrvísi út aftaná at hava fingið blokkstuðulin. Balansan hækkaði við einum 700-800 mió.kr. tá blokkstuðulsskipanin kom í gildi og ikki tí, at undanfarna landsstýrið oyðslaði. Eisini hækkaði oljugrunnurin balansuna á fíggjarlógini við 100 mió.kr. og ikki tí at undanfarna samgonga oyslaði.

Peningurin í oljugrunninum nakað av teimum eru læntir út, annars eru teir ikki brúktir upp, sum ein útreiðsla á fíggjarlógini, við at takað barnastyrkin úr skattinum og broyta lógina, so hækkaði eisini balancan á fíggjarlógini við øðrum einum 60 mió. kr, og ikki tí at undanfarna landsstýri akkurat oyslaði. Hettar var meira roknskapar tekniskar broytingar, so her er talan um næstan eina heila milliard, sum fíggjarlógin hevði verið minni um hesar broytingar ikki høvdu farið fram á fíggjarlógini.

Tað er fullkomiliga villleiðandi og tíðanverri má eg halda ímóti betri vitandi at menn bera fram soleiðis, sum almennu útreiðslurnar hækka við hesi somu milliard hesi seinastu fýra árini.

Nú brúkti eisini løgmaður megin partin av sini fyrru talu til at viðgerða landskassabúskapin, hann segði kanska ikki tey fýra árini, nevndi ikki tey fyra árini, men tað var tann periodan í hvussu so er, og royndi at burturforklára, vil eg siga, hví tað faktisk gekk heilt gott her til vit fingu bakkasti við fallandi fiskaprísum og ellum tí sum tað hevði við sær um várið 1988. Hví viðgjørdi hann so ikki 5 ár aftur í tíðina, í staðin fyri 4, tí so kundu vit eisini fingi hansara forkláring uppá hví fíggjarlógin í 1984/85 hevði tað største undirskot nøkur fíggjarlóg hevur haft. Hví veðhaldsgrunurin og grunnurin til endurnýggjan av skipaflotanum var minus við væl meira enn 100 mió. kr. tilsaman. Hvussu landskassans gjaldføri var í 1985, tá tað landsstýrið tók við, hvussu kreditvirði okkara uttanlands var tá. Tá fingu vit nevniliga eingki lán uttanlands í langa tíð, nei tað hoyrdu vit so eingki um. Men álvatos tað nyttar eingki at halda fram við at brigsla, vit mugu royna at analysera støðuna vit í dag standa í, og vurdera hana so realistiskt sum gjørligt, tí vit hava stórar fløkir at greiða og stór mál at loysa. Hesum var løgmaður nú eisini inni á, og tað er her vit skulu samarbeiða og eg hopi eisini vit fáa eitt gott samarbeiðið framyvir.

Eitt afturat, tað hevur verið ,kann eg kalla ein skrekkkampanja um, hvussu illa stendur til í okkara landi, her hevur av álvara verið yvirbjóðjað. Rætt er at vit hava ógvuliga stórar búskaparligar trupuleikar at loysa, tað skal eg í hvussu so er ikki siga annað, men tað hevur ofta verið borið fram um okkara vánaliga kreditvirðið, eingin vil læna okkum pengar o.s.fr. Eg má siga tað er ikki merkiligt um fólk blíva forskrekt, tá tey hoyra at tað stendur so illa til í okkara landi, at tað eingin banki sum vil læna okkum pengar, og tað eingin sum vil arbeiða saman við okkum, og til tað vil eg bara siga, at hettar passar slet ikki. Í landsstýrinum fáa javnan tilboð um lán úr útlendskum bankum til ógvuligar sámuligar treytir, so hattar passar ikki.

Vit hoyrdu at danski statsministarin, hann gjørdi

ein vørr her fyri um okkara lántøkur úr danska kommunukredittelagnum, sum vit hava lánt pening frá hesi seinasti 50 árini, man skuldi næstan trú, at teir vóru farnir á heysin av okkum. Men har nýtast føroyingar ikki at skammast, vit hava verið góðir kundar, hvør einasti føroyingur kann við røttum ryggi og við góðari samvisku hyggja danska statsministarin beint í eyguni. Hvør einasta lánt kr. er aftur goldin við rentu, teir hava aldrin haft trupuleikar av at føroyingar ikki hava goldið. Kommunukreditfelagið hevur aldrin mist eitt reytt oyra uppá okkum.

Tann sum fæst við búskap, hann kann ongantíð siga seg verða lidnar við arbeiðið. Tá man best hevur vunnið á nøkrum trupuleikum, so stinga nýggir seg upp og soleiðis vil jú altíð verða, tað gongur upp og niður.

Hendan samgongan vil royna at virka fyri at loysa teir trupuleikar sum leika á í dag, og tað verður heldur eingin annar, sum ger hettar, tað hevur hetta orðaskifti prógvað.

Í hesum drúgva orðaskifti er ikki komin ein einasti konstruktivur tanki frá andstøðuni, og tað skal verða mín vón, at hettar arbeiði fer at eydnast hjá hesu samgongu, sum nú hevur tikið við ábyrgd í Tinganesi.

Tjóðveldisfloksins partur skal ikki liggja eftir tá tað er at taka ábyrgd av okkara landi. Takk fyri

Jógvan Sundstein løgmaður (ff.)

Harra formaður

Eg haldi eg fari at byrja við at takað undir við tí sum seinasti æraði røðari segði, eg haldi hon talaði væl fyri samgonguna og tá ið hon helt at eg atti at fari 5 ár aftur í tíðina í míni fyrri tali, heldur enn 4 so má eg siga, at tað sum eg tá gjørdi, tað var tað sum hon eisiri segði, at eg royndi at analysera støðuna, soleiðis sum hon var, tí var ikki fyri at fara aftur í tíðina, at eg tók dømini fram, tað var fyri at vísa á grundgevingina also forútsetningarnar, orsøkina til ta støðu vit eru í dag, og eg skal ikki her fara at seta eitt mark akkurat við ein bestemtan dato aftur í tíðina,

um tað eru 4 ella 5 ár, tað er fyri so vítt undirornað, tað er líkagildugt. Vit mugu bara konstatera at vit vóru komin í eina støðu av tí sum var hent hesi árini framman undan við hesi her stóri ekspansiónini, sum hevði verið, og at tað vórðu gjørd tiltøk, tað vóðru gjørdar dispositatiónir, eisini politiskar viðtøkur, sum høvdu fororsakað hettar her, umframt at tað eisini vóru uttanifrá komandi ting, sum tað at vit høvdu verri fiskimøguleikar, sum tað at vit høvdu lægri fiskapísir, og hava haft lægri fiskaprísir nú í eina tíð, og ymist annað sum er orsøkin til alt hettar her. Men líkamikið hvar orsøkin er so mugu vit bara konstatera at soliðis er tað í dag, og ti er hendan her samgongan neydd at gera ymisk tiltøk. Hesi tiltøkini eru partvís gjørd. Eitt av tiltøkunum er hendan fíggjarlógin sum liggur til viðgerðar her í dag, hon er skorðin niður í mun til árið frmmanundan, og hon er viðvirkandi til at skattatrýstið framyvir ikki skal veða so stórt. Um vit bara halda fram og læta hana hækka, so verður skattatrýsti bara framhaldandi størri.

Eg haldi eisini at við hesum tiltøkum, og við hesum sum vit her eisini royna at gera fyri at bøta um kappingingarførið, við t.d. við tí fráboðaðu lóggávuni um at dýrtíðarviðgerðin verður avtikin o.s.v. við hesum tingum so vita tað at kappingarførið verður betri, vit gera tað at tað verður meiri líviligt her, og vit arbeiða ímótur tí sum annars vil verða úrslitið nevniliga eitt komandi arbeiðsloysi. Tað er tað sum vit millum annað arbeiða ímóti.

Eg haldi eisini tað eru onnur ting skulu síggja í eyguni, nú var Hegeir Nielsen í gjár inni á spurninginum viðv. okkara samráðingum við EF og vit eru jú í samráðingum har, gott nokk eru hesir samráðingar komnir í stand av tí at EF hevur gjørt vrøvl um ta skipan ið vit hava haft, men tað hevur eisini leingi ligið eitt ynski frá Føroyskari síðu um at fingið broyttar avtalur við EEC. Soleiðis sum støðan er beint nú, so hava vit sent skriv til EF, vit hava lagt upp til EF eisini á tí einasta fundinum, sum var um at tað verður gjørd, skipað ein fríhandilsavtala ímillum Føroyar og EEC. Tað er tað

sum nú er innanhýsis til viðgerðar hjá EEC í kommissiónini hjá EEC, og verður tað soleiðis at teir ganga við til hettar, at vit fáa eina fríhandilaskipan, so fáa vit nógv nógv størri møguleikar fyri okkara eksporti, og so vil tað verða at tað minna fisktilfeingi, ið vit hava at ráða yvir, kemur at táa nógv meira virði fyri okkum tí at vit fáa størri tollfríðan innflutning og at vit kunnu produsera nógvar aðrar vørur, sum geva okkum nógv hægri prís við ongum tolli. Møguleikarnir hjá okkar fiskivinnu og hjá okkara fiskavirkjum verða nógv betur, tí haldi eg at vit eiga ikki í løtuni í hvussu so er at síggja so svart uppá tað, men vit eiga at hava hettar fyri eyga og í øllum førum liva í teirri vón, sum vit enn hava um at vit fáa eina slíka avtalu, og fáa vit ikki akkurat tá avtaluna, so fáa vit í øllum førum eina betri avtalu enn hana vit hava beint nú. Tað gevur møgulreikar fyri ekspansjón frá tí rætta endanum, nevniliga frá sjálvari framleiðsluni í landinum. Takk fyri

Tordur Niclasen (kff.)

Harra formaður

Í mínum innleggi í gjár fór eg meiri all round í viðgerðini av løgmansrøðuni, men vil nú koma inn fíggjarlógaruppskotið, sum í dag fyriliggur.

Nú er tað soleiðis at fíggjarlógin, í henni átti man at sæð ta sambandi sum var ímillum løgmansrøðuna, ella teir tankar sum løgmansrøðan segði átti at komið til sjóndar í fíggjarlógini, men eg haldi at í ávísum førum er sambandið ikki seliga gott og í ávísum førum enta mótsigandi.

Harra formaður

Tað eru tvær meginreglur ið eiga at verða fylgdar í samband við sparingar, og tað er heilt burturvið tá ávísir tingmenn í samgonguni siga at Kristiligi folkaflokkurin ikki ynskir sparingar, vit hava ásannað fleiri ferðir at tað er neyðugt við sparingum og eg kann lova samgongumonnum tað, at vit vilja eisini medvirka til sparingar í fíggjarnevndini, men vit eru ósamdir við

samgonguna í hvar í hesar sparingar skulu gerast.

Harra formaður,

Tað eru tvær meginreglur, tað er hettar, hvat ið búskaparliga tolir at bíðja og tað eru arbeiðir, sum tola at bíðja og harra formaður, so er tað eitt afturat hvat reint menniskjaliga er forsvarligt í samband við sparingar.

Fyri at endurtaka tað sum andstøðumenn hava sagt og tað sum vit sjálvir hava víst á er tað, at fyriliggjandi uppskot kemur í órímuligt mát at raka tey veikastu í okkara samfelag, umframt ta eykaskattarokning sum Pauli Ellefsen hevur sent út til tað føroyska fólkið, eina skattarokning sum tann vanligi lønmóttakarin kemur at merkja sviðan av. Nú fortaldi hann her fyri Føroya fólki í gjárkvøldi, at hann hevði verið í kontakt við onkran, sum hevði hálvavegna hevði skeldað hann eitt sindur, og tá hann hevði snakkað við henda nærri, so funnu teir útav, at hann var slett ikki raktur av hesum inntøkulógunum.

Harra formaður eg møtti einum manni í gjár. So sigur hann við meg, nú fóru teir illa við mær, eg hugdi uppá hann og fyristillaði mær at hann var álopin av nøkrum ótangum, eg sigi hvussu tá. Jú handan eykarckningin eg fekk frá mynduleikunum. Soleiðis merkir merkir vanligi skattgjaldarin tað kring landið.

Heini O. Heinesen var her uppi, hann vísir til tær skeðringarnar koma kanska at hava arbeiðsloysi við sær, og tað er júst tað sum vit hava víst á, tað er júst tað sum Føroya Handverksmeistarafelag hevur víst á, at til heystar og til várs koma kanska 1000 fólk at verða arbeiðsleys. Eg setti ein relevantan spurning fram her í gjár, hvat vilja tit gera við hesi fólk, hvar skulu inntøkurnar koma frá, og tað er satt sum tað er sagt, at tað eru bólkar í okkara samfelag, sum ikki eiga lut í hesu meirnýtslu, sum hevur verið og sum heldur eigur ikki lut í hesari rokning, sum tey hava fingið.

Harra formaður, hyggja vit eftir løgmansrøðuni so siggja vit eitt nú undir heilsumál, og fari at biðja um loyvi at eudnurgeva: "Tað verður her sagt at útbyggingin av sjúkrahúsinum verður útsett. Ílagi, tað er ein

politisk avgerð, so verður sagt, kortini verður arbeitt við at betra um heilsutænastuna, og verður primer heilsutænastan støðugt útbygd og samskipað." Hyggja vit so eftir fylgiskjølunum til figgjarlógina, sum ikki hava fingið fakliga viðger, sum ikki hava fingið politiska viðgerð í teimum sjúkrahússtýrum, sum hvussu so er ikki galdandi fyri landssjúkrahúsið, so siggja vit at her bert eitt hold av sjúkrasystranæmingum verður um ári, alsó við øðrum orðum, man sigur mar ætlar at útbyggja hesa heilsutænastuna, betra um hana, men samstundis ætlar man at steðga fyri at neyðugt starvsfólk fæst í hesa tænastu.

Harra formaður, tað fyriliggja ikki nakrir viðmerkingar beinleiðis frá landsstýrinum í hesum máli, so eg veit ikki hvørjar tankar landsstýrið hevur gjørt sær. So vítt eg skilji hettar, so hevur landsstýrið givið sjúkrahúsverkinum boð um at tit fáa 207 mió. kr., so er tað at tit skulu halda tykkum innan fyri hetta, og avleiðingarnar av hesum er so tað, sum er uppskitsera her frá sjúkrastjóraembætinum.

Nú er tað soleiðis at tað hevur leingi verið víst á, at tað er tørvur fyri útbúðnum fólki innan fyri heilsuverkið. Tað var millum annað við tí grundarlagi at ein eykaflokkur av sjúkrasystranæmingum varð tikin inn fyri tveimum árum síðani, og nú verður hettar steðgað. Tað er tørvur á, samb. upplýsingum í dag, 72 fultnormeraði størv standa sum ikki eru sett inna fyri heilsuverkið, við øðrum orðum kanska talan um út ímóti 125 størv umroknað til niðursetta tíð eisini. Eg spyrji meg sjálvan, hvat er ætlanin, hvussu skulu tit fáa eitt heilsuverk at virka uttan neyðugt starvsfólk.

Harra formaður, tað her sagt eisini, at tað er ætlanin at styrkja eina fakliga og umsitingarliga leiðslu fyri heilsuverkið sum heild, og tað var jústhatta, sum vit í undanfarnu samgongu høvdu sett okkum sum setning m.a. tí høvdu vit sett á figgjarlógina ein heislustjóra fyri at samskipa, og eg eri púra sandur við landsstýrið, tað er neyðugt at samskipa heilsuverkið. Hann er tikin burtur, ístaðin fyri hevur man sett, sofremt hettar virnu frama, man hevur sett at her sum

eitt lið í sparitiltøkunum verður arbeitt fram ímóti at fáa fleiri hjálparlæknaformeringar fluttar til yvirlæknarnar, ok., tað kann verða sín sak. Men so er eisini ætlanin, at eini yvirlækni skal setast aftur at á landssjúkrahúsið, nettup til hettar endamáli, at gjøgnumføra tær sparingar sum landssjúkrahúsið, nú man ætlar at innføra har. Eg haldi hetta er heilt burtur við, tá talan er um eitt heilsuverk, sum eina heild.

Harra formaður, so verður tað eisini sagt her, at ambulatoriivirksemi, at innleggingarnar verða styttri og færri soleiðis at songjatørvurin minkar, man vil arbeiða og styrka hesa funktiónina. So er tað eg loyvi mær at spyrja, hvussu samsvarðar tað við tær viðmerkingar sum eru at siggja frá sjúkrahússtýrinum í Suðuroy, har sagt verður at fysiurgiska deild verður afturlatin fyri ambulantar sjúklingar við tí fyri eyga, at uppsiga tvey av teimum fýra starvsfólkunum ið har starvast. Tað er líkasum tað er manglandi logikkur ímillum tað sum verður sagt í løgmansrøðuni og tað sum verður sagt í fíggjarlógaruppskotinum.

Harra formaður, tað er einki at takað fell av at sjúkrahúsverkið og heilsuverki er ein stórur partur av útreiðslusíðuni á fíggjarlóginið. Hesi partur sum nemur við okkum øll fyrr ella seinni, og sum vit øll eiga at verða góð við, og røkja á bestan hátt.

Nú avsløra landsstýrið her at arbeitt verður við at avtaka endurgjald av ferðaútreiðslur fyri sjúklingar, og at innføra gjald fyri laboratorii og røntgentænastu, her fara nú nýggjar leiðir at verða gingnar. Eg veit ikki, hvussu langt tað er komið við hesum arbeiði, men eitt er givið, at skal man nú innføra eina nýggja meginreglu her við at fólk skal gjalda fyri laboratorii og røntgentænastuna, so skal ikki nógv fantasi til at fyristilla sær hvønn hettar kemur at raka, man kann fyristilla sær ein ið hevur verið hjá lækna og fær ein laboratoriiseðil stungnan í hondina ella fær boð um at fara til røntgen. Skal nú sum nakað spildurnýtt í føroyska heilsuverkinum viðkomandi verða noyddur at hyggja eftir sínari bankakonti áðrenn hann fer til landssjúkrahúsið ella annað sjúkrahús. Hetta eru grund-

leggjandi broytingar, sum koma at rakað tann sum frammanundan er ikki best fyri í okkara samfelag.

Harra formaður. Her verður eisini tosað um, at nú skal økissálarlæknin ikki arbeiða sum økissálarlækni sjálv um hann er settur sum økissálarlækni, men nú skal hann koyrast inn á eina psykriatiska deild, sum yvirlækni.

Harra formaður. Hettar kemur at raka tey sonnisveiku í okkara samfelag, og eg eri púra samførdum um, at tað fyriliggur eingin sparing í hesum, tí sparingin liggur nettup har tú kanst fyribyrgja innleggingum har tað kann gerast. Her verður eisini tosað um at ein ávís psykriatisk deild skal verða stong, hvat vilja tit gera við tann trupuleika sum í dag er ein realitetur í okkara samfelag, at vit standa og mangla pláss nettup til ávís sløg av psykriatiskum sjúklingum, hvar skulu tey fara? Røktarheimini kring landið, tey eru full av fólki, av búfólkum væl at merkja, so tað fyrikemur mær harra formaður, eg havi sagt tað fyrr, at ójavnir í figgjarlógaruppskotinum, hann er skríggjandi, hann kemur til sjóndar og samanum líkið má eg bara siga, at á ávísum konti hava menn megnað eitt sum á menta- og skúlaøkinum, eg má rósa Signari Hansen fyri tað, hann hevur megnað ikki at loyva serligum sparingum, rakstarkligum sparingum á tí økinum meðan fólkaflokkurin fyri frið skyld, helst hevur givið eftir soleiðis sum man altíð gerð. Í mínari verð eigur heilsuverkið ongan góðan í landsstýrinum í hesum døgum. Takk fyri

Jørgen Niclasen (ff.)

Harra formaður

Til viðgerðar í dag er uppskot til figgjarløgtingslóg fyri ári 1990 og løgmansrøðan á Ólavsøku í ár.

Tá núverðandi samgonga varð skipað, vórðu týðandi greinir í samgonguskjalinum at styrkja um høvuðsvinnu okkara fiskivinnuna, og ikki minst at minka um tað ovurhonds stóra penganýtslu, sum javnaðarlandsstýri framdi í undarfarna vælskeiðið.

Løgmansrøðan í ár og uppskotið til figgjarløgting-

slóg fyri 1990 eru so tvey av programmunum fyri styrkandi og endurskapandi gongd.

Í undanfarna vælskeiði vaks fíggjarløgtingslógin við millum 200 og 400 mió. kr. um árið. Eftir uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 1990 er harafturímótur ein minking í landskassans útreiðslum uppá slakar 300 mió. kr.

Útflutningruin minkaði ár undan ári í undanfarna vælskeiði, meðan vit undir hesi samgonguni longu nú kunnu frøðast um ein vøkstur í útfluttinginum fyrsta hálvár í ár í mun til fyrsta hálvár í fjør uppá heili 10%.

Hóast uppskotið til fíggjarløgtingslóg 1990 vísur eina minking í landskassans útreiðslum, hevur hendan tó nakrar viðmerkingar uppiborнar.

Tað vísir seg víða at hyggja ígjøgnum uppskotið sæst ein stór minking í ætlaðu íløgupolitikkinum, meðan minkingin fyri raksturin er eftir míni meting alt ov lítil. Íløgur eru neyðugar fyri samfelagið, bæði innan fyri tað almenna og eisini í tí privatu vinnuni. At spara nakrar íløgur 1990 merkir ikki í sjálvum sær eina sparing, men haraftur ímóti eina útseting av íløgunum. Hendа útsering kann í ávísum førum merkja eina sparing aftur eftir hæli. Millum annað kann nevnast eitt dømi, nevniliga tunnilin millum Kalbaksbotn og Kollafjørð. Hesin tunnil skal nú toyggjast yvir eitt ávíst áramál. Hvat um vit í staðin settu fulla kraft aftur á tunnilsgerðina við lántøku um neyðugt og fingu tunnilin kláran at takað í nýtslu skjótast gjørligt. Kundi verið sett eitt bummpeningagjald á hvønn ferðandi bil ígjøgnum tunnilin og soleiðis skapt eina inntøku til landskassan. Íløtuni koyra umleið 2400 bilar eftir oyggjarvegnum um døgnið ella tilsamans 876.000 bilar um árið. Um vit bert settu eitt bummpeningagjald til bert 20 kr. fyri hvønn ferðandi bilin ið fór gjøgnum tunnilin, og rokna vit sama talið av ferðandi, sum á oyggjarvegnum, kundi hetta givið eina inntøku uppá slakar 18 mió kr. árliga. Hesin peningur kundi so verið nýttir til partvíst fígging av undirsjóartunnilinum um Vestmannasund, sum eisini kemur at geva pening í landskassan við

bummpeningi, also høvdu vit fingið tvær íløgur ið báðar góðu landskassanum heilt fitt av peningi.

Venda vit aftur til uppskotið til fíggjarløgtingslóg fyri 1990 kunnu vit hyggja eitt sindur eftir forholdinum millum rakstrarkonti og íløgukonti. Taka vit § 10, sum er løgtingið, sæst eingin sparing, taka vit § 11 sum er landsstovnar er heldur eingin sparing, taka vit § 19, sum eru tey nógv umtalaðu almannamálini, sæst heldur ikki nøkur munandi sparing, hesar eru allar útilukkandi rakstarkonti. Hyggja vit so haraftur ímóti eftir eini útilukkandi íløgukonti nevniliga § 13, sum er samferðslumál, síggja vit eina minking uppá slakar 50 mió. kr. og soleiðis kundi ein hildið fram.

Tað sær ikki út til at verða serliga lætt at fáa nakra munandi upphædd sparda innan rakstur, men eg eri fullvísir í at hettar kann gerðast. Hettar nýtist ikki at fáa álvarsligar fylgir, vit kunnu jú bara hyggja at § 12, sum er eitt so viðbrekið mál sum heilsumál, har skulu sparast góðar 40 mió. kr. Hettar kann gerast uttan at føra álvarsligar fylgir við sær, men hettar mál er jú umsitið av fólkaflokkinum.

Eg eri fullvísir í eins og framsøgumaður fólkafloksins Anfinn Kallsberg var inni á í sínum fyrsta innleggi, at tað verður neyðugt við lógarbroytingum um vit bert skulu megna at spara tað ið ætlanin er spara eftir uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 1990.

Eg vil mæla til at hesar lógarbroytingar verða gjørdar og samtyktar ongantíð ov skjótt, soleiðis at verðuligar sparingar innan rakstur kunnu gerðast, og ongantíð betur um tær kundu verið fleiri enn í fyriliggjandi uppskoti.

Innan samferðslumál havi eg bitið merki í at Gásadalstunnilin er komin við á løgtingsfíggjarlógina í 1989 og at hesin aftur er komin við í 1990. Tó hann ikki hevur fingið eina ávísa upphædd í uppskotinum fyri 1990, so hevur hann saman við hinum tunnilsarbeiðinum í Føroyum fingið 36 mió. kr. Fyri 1989 eru játtaðar 3 mió. kr. til hetta arbeiðið og eg fari harra formaður, at heita á landsstýrismannin í samferðslumálum Jóngerð Purkhús um at bera so í bandi, at munandi upphædd verður

nytt til hetta arbeiðið aftur í 1990.

Meðan eg eri inni á samferðslumálum, vil eg nýta høvi at koma inn á vegaskervið. Vesturi í Sørvági hevur eingin landsvegur verið. Tað hevur verið nýttur ein av bygdavegunum til landsvegferðsluna út til Býggjar. Eesin vegurin liggur fram við skúlanum og er ein stórur partur av hesum vegur, har flestu skúlabørnini ganga til og frá skúla. Onkur ferðsluvannlukkan er hend á hesum vegi, men tíbetur eru øll enn komin frá tí uttan álvarsligt mein. Vegurin er ótíðarhóskandi og vandamikil. Eg vil tí harra formaður, loyva mær at spyrja samferðslumálaráharran Jóngerð Purkhús, um einki fyriliggur um gerð av landsvegi íggjøgnum Sørvág tí, hettar er neyðugt ongantíð ov skjótt.

Játtanin til Strandfarskip landsins er sett til 35 mió. kr. í hesum uppskoti til fíggjarløgtingslóg og er hettar ein minking uppá 10 mió. kr. í mun til í ár. Í fylgiskjølinum til uppskotið finna vit, at Strandferðslan kann klára seg við hesi upphædd um allir ferðaseðlarnir fyri ferðandi verða hækkaðir við 5 kr. og fyri bilar við 10 kr. Henda ferðaseðlahækking er mett at geva umleið 3 mió. kr. Hettar kunnu vit í Vágum ikki góðtaka.

Sambandið um Vestmannasund hevur í fleiri ár verið einasta rutan hjá Strandferðsluni, ið hevur givið rakstraravlop við øðrum orðum hevur hendan rutan fíggjað undirskotini hjá øllum hinum strandfaraskipinum. Vit kunnu í Vágum tí ikki góðtaka, at á eini rutu sum frammanundan gevur stórt rakstaravlop skal áleggjast hæking í ferðaseðlaprísinum. Hettar merkir ikki at játtanin Strandfarskip landsins skal hækkast, nei heldur tvørtur ímótir, tað
átti her eins og nógva aðra staðni heldur at verið spart meir enn at kravt meir frá brúkarinum. Vit kundi t.d. avtikið beinleiðis siglingina millum Tórshavn og Klaksvík, henda sigling er eftir míni meting óneyðug, umfrant, at hon kostar landskassanum heilt fitt av peningi. Vit hava frammanundan 2 ferðaleiðir millum hesi áður nevndu støð, nevnliga onnur, at fara eftir oyggjarvegnum til Leirvikar og síðan yvir um til Klaksvíkar við Ternuni ella hin vegin at fara við Dágvuni inn á Toftir

og har frá til Leirvikar og síðan yvir um. Tað má tí verða óneyðugt, at hava hesa triðju ferðaleið. Eitt annað, sum ofta hevur verið upp á tal, er at selja antin Teistan ella Smyril. Meðan annað av hesum skipum er í sigling, liggur hitt væl bundið til bryggju. Tí átti tað at selja annað av hesum skipunum at verið framalaga í huganum tá sparingar verða viðgjørdar.

Fiskivinnan, her undir serliga fiskiflotin sum í sini tið gjørdi alternativið til landbúnaðin hovur seinastu 4 árini havt sera trupult við at fóta sær. Ísfiskaflotin hevði í valskeiðnum undir undanfarna landsstýrið eitt samlað rakstrarhall upp á úti við 400 mió.kr. Hetta, hóast, at fiskiflotin tey undanfarnu árini 1980-1984 ikki hevði hall, mer holdur eitt rakstraravlop. Nú sitandi samgonga hevur sett sær fyri at fáa á rættkjøl, tað ið hálvdist í valskeiðnum undir javnaðarlandsstýrinum. Ætlanin er við fleiri tiltøkum, at bjarga hesi vinnu. Nøkur tiltøk eru longu sett í verk og koma fleiri at fylgja eftir. Eitt av teimum, er at tryggja rimiligt avreiðingarprísstøði. Annað tiltak er, at peningur verður játtaður til at finna nýggjar og ótroyttar leiðir umframt at finna nýggjar veiðihættir. Stuðningsskipanin skal umskipast, tyngjandi gjøld og annað skulu broytast, royndir skulu gerast við uppboðssølu og nógv umtalaði upphøggingarstuðulin er settur í verk. Tað er júst upphøggingarstuðulin ið eg skal nerta eitt sindur við her. Upphøggingarstuðulin er til at lætta um veiðitrýstið á veiðugrunninum. Vit hoyrdu nú í útvarpinum, at 18 skip hava fingið játtað upphøggingarstuðul frá undantarna landsstýrið og er hetta tilsamans ein upphædd upp á umleið 73 mió.kr. Eg fari í hesum viðfangi, at loyva mær, harra formaður, at spyrja landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Jógvan I. Olsen, hvussu nógv tons hesar 73 mió.kr. lætta um veiðitrýsti og hvussu nógvar krónir hvørt tonsið so kostar landskassanum og í triðja lagi, hvussu nógvar krónur út frá hesi javnaðarútrokning hevði komið at kosta landskassanum at minka um veiðitrýsti eini 15-20.000 tons árliga. Hesin spurningur er sera áhugaverdur og kemur uttan iva at vísa eitt grefligt

dømi um, hvussu ábyrgdarleyst landsstýrið við Atla Dam á oddа stýrdi hesum landi. Livst so spyrt.

Tað er nú frøðiligt at vita sær, at hesin upphøggingarstuðul nú skal broytast til at geva upphøggingarstuðul í mun til veiðunøgdina sum skipini til upphøgging hava broytt veiðugrunnarnar. Fyri at enda, at taka saman um, má sigast at uppskotið til løgtingsfíggjarlóg fyri 1990 og løgmansrøðan á ólavsøku í ár, bera boð um, at vilji er fyri, at venda gongdini aftur á rætt kjøl. Ætlanin er at venda vøkstrinum á fíggjarløgtingslógini seinastu árini til eina minking og ætlanin er eisini at seta tiltøk í verk fyri at venda rakstrarhallinum seinastu árini hjá høvuðsvinnu okkara, fiskivinnuni til eitt rakstraravlop. Stutt sagt, at broyta tveir tíðandi faktorar í okkara samfelag soleiðis, at vit einaferð í framtíðini aftur kunnu liva í ti vælferðarsamfelagi við livdu í í 1984. Lat okkum vóna, at núsitandi samgonga kann vísa hegni og dirvi fyri at leggja rygg til hesar broytingar. Takk fyri.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Nei eg vildi bara takka fyri hasa røðuna sum eg haldi var góð í allar mátar, nógv sannleiksorð og tað er stutligt at hoyra frá ungum monnum. Eitt av teimum góðu hugskotum, tað var bumpeningur og tað bleiv sett í samband við Kollafjarðabergholi, nú var talan um ein vágamann sum kennir bumpening bara í samband við berghol, men tað er nú ikki neyðugt, at hava eitt hol, fyri at hava bumpening, hann kann setast upp á oyggjarvegnum og so fáa vit inntøkur í landskassan uttan at avhalda nakrar útreiðslur og eg hevði tað sjálvur frammi undir samráðingum og har eru nógvir pengar at vinna, um man t.d. setti ein bumm á oyggjarvegin og aðra staðni, fyrimunir høvdu verið nógvir, vit høvdu fingið inntøkur inn í landskassan, vit høvdu fingið fólk upp í bussarnar sum koyra tómir, færri høvdu koyrt í persónbili sum einkultpersónar og alt í alt hevði tað verið ein útmerkað gongd. Men tað sum fekk meg til at taka orðið, tað var

at takka fyri hasa góðu ræðuna.

Niels Pauli Danielsen (kff.) viðmerking

Harra formaður.

Eg fari eisini at takka tí nýggja unga nanninum fyri ræðuna og ynskja honum tillukku, men so eisini siga, at eg veit ikki rættiliga hvønn roknskap hann hevur hugt eftir, eg havi ikki sæð allar, tað havi eg ikki, men teir roknskapir sum eg havi sæð hjá strandferðsluni. Har er tað eisini ein onnur leið enn bara um Vestmannasund sum hevur givið yvirskot øll árini, men tað er Ternan um Leirvíksfjørð, eisini hon hevur givið yvirskot og eg má geva honum rætt í tí sum stendur í hesum her frá landsstýrinum um at hækka ferðaprísinar; tað er í fylgiskjølunum um at ferðaprísirnir skulu hækka 5 kr. fyri hvørt ferðandi og bilferðaseðlarnir hækka við 10 kr. fyri hvørt ferðandi. Eg gangi út frá sum givið, sum eisini háttvirdi tingmaðurin Jørgen Niclasen gjørdi, at har lið yvirskot er, har er ikki neyðugt at hækka tað, annars má eg tíverri skuffa hann, harra formaður og siga, at tað er rætt at tað stendur í hesum her eisini nevnt um Gásadalsbergholi enn einaferð, men tíverri tað er eingin króna sett av. Tað stendur bara her, saman við nógvum øðrum, men so stendur at tað er 30 mió.kr. settar av og hetta skal brúkast til Sumbiartunnilin og til tunnilin um Kalbaksbotn og har skulu brúkast 45 mió.kr næsta ár og her eru settar av 30 mió.kr. so her mangla 15 mió.kr. og tíans heldur at nakað loypur av, so har verður tíverri eingi til Gásadal so sum vit gjørdu í seinastu figgjarnevnd, tá settu vit hóast alt nakrar mió.kr. av til at byrja, men tað er also burtur nú, tíverri.

Henrik Old (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var til handa unga mannin, man skuldi ikki trúð, at fólk í Sørvági hevði livt av fiskarí, tað má verða frammand orð í hansara verð at man livir av fiska-

riði aftan á ta viðferð sum vit sum sótu ið seinastu samgongu fingið fyri tær játtanir sum vit hava verið við til at játta eisini vesturi í Sørvági. Eg haldi, at tað hevði verið smáligt við avreiðing á flakavirkjum í Sørvági, tað sama sum tað hevði verið smáligt á øðrum flakavirkjum, um hesar játtanir ikki høvdu verið. Eitt nýtt hugskot kom fram, um hvussu man kundi vinna pengar frá Fólkaflokkinum og frá hesum unga manninum, tað var við at tunnilin til Kaldbak bleiv gjørd skjótt liðug, bumpengar, tunnilin um Vestmannasund skuldi gerast beinavegin so fekk man inntøkur, tunnilin til Gásadals skuldi gerast, so fekk man inntøkur, eg haldi at hann gloymdi at nevna hina hjá Jógvan Olsen undir Skálafjørðinum har hevði man eisini fingið inntøku, men tað er ið hvørtfall nakað nýtt, at man fær so stórar inntøkur við at gera hesar tunnlar beinavegin, samtíðis sum man skal selja hesi skipini sum hesin maðurin fyrisløg um Smyril og gloymdi at siga, at hann hevði 2 um Vestmannasund, sum liggja í kø og biða eftir at sleppa til kei, men hvussu man skal hava hesi skipini siglandi við ongum fólki, rationalisera, fólki skal skerast niður. Man hevur hoyrt um, at man fær keypt radiostýrdar bátar, smádreingir plagdu, at hava radiostýrdar bátar at sigla við, tað var møguligt, at hetta var eitt hugskot hjá Fólkaflokkinum nú, at fingið radiostýrt Ternuna og Smyril og so kundi Jóngerð siti á Kirkjubønesi og onkur annan fólkafloksmaður vesturi í Vágum og stýrt við hesi radiostýringini við ongum fólki umborð. Tað er ið hvørtfall nakað nýtt, at tað ber til at sigla við ongum fólki.

Jógvan I. Olsen (sb.)

Harra formaður.

Tað er so mangt sum umbroytist á mansins ævi. Nú havi eg síðan 1970 sitið á Føroya løgtingi og verið við til ymsar viðgerðir, tikið støðu og atkvøtt um tey mongu mál sum hava verið til støðutakan. Nú er hetta komið at enda ið hvussu so er fyribils og eg vil fegin nýta høvi

til, at takka øllum ið eg havi samstarvað við, hetta langa tíðarskeið í hesum húsi og tað líka mikið um tað eru parlamenn ella ikki. Nú eri eg so endaður í landsstýrinum og skal sostatt verða hískallur hjá løgtinginum í búgvunum og skal umsita lógir og fyrisskipanir sum løgtingið samtykkir. Tá slíkar umrøður sum henda áður hava verið á tingið so havi eg gjørt mær mítt innlegg við aðressu til landsstýrismanningina og manningina í fíggjarnevndini, men nú er so vent í holuni, nú eru tað hinir løgtingsmenninir sum koma við innleggunum og landsstýrismanningin fær so at vita, hvat teir halda um hesa løgmansrøðu og uppskotið til løgtingsfíggjarlóg fyri 1990. Núverandi samgonga er enn so ung og serliga fyri okkum úr Sambandsflokkinum, sum eru frá seinnu urt í hesi samgongu, vit eru á byrjunarstøði. Eg havi tí roynt, at lurta eftir hvat borið hevur verið fram um tey málsøkir sum eg umsiti í landsstýrinum, fyri at táa góð ráð, hugskot og leiðbeiningar og eftir førimuni royna at svara upp á spurningar ið verða framsettir. Men eg má viðganga at eg havi ikki staði so væl við, so tað er kanska okkurt fari aftur við borðinum tá eg ikki havi verið hjá, so tað er møguligt, at tað eru spurningar komnir sum mær ikki eru komnir fyri oyra. Eg lurtaði so eftir framsøgumonnunum og har eru so onkrir spurningar komnir fram. Fleiri enn ein hava havt uppi, tað er hesin góði upphøggingarstuðulin sum eisini seinasti ræðari hevði frammi og hann setti mær nakrar beinleiðis spurningar, eg kann tíverri ikki svara hasum spurningum, eg havi ikki gjørt nakrar beinleiðis útroknингar upp á tað sum hann spurdi um. Viðvíjandi upphøgginarstuðli, hann er væl komin fram, tí at man hevur mett, at veiðitrýstið hevur verið ov høgt, tað var ein lóggáva sum kom fram í 1988 og tá blivu settar 40 mió.kr. á fíggjarlógina. Í 1989 blivu so settar 35 mió.kr. haraftrat var ein lániheimild upp á 30 mió.kr. og á uppskotinum til komandi fíggjarlóg eru settar 35 mió.kr. Samgongan tann næst seinasta hon gjørdi so reglugerð um hesa lóggávu og játtaði 18 skipum upphøggingarstuðul og tá ið vit komu til, so var einki av hesum skipunum avgreitt, tí at tað var onkur lángevari sum ikki góðtóku reglugerðina og tað

var realurin og fiskaríðbankin sum ikki vildu góðtaka, at teir bert fingu 80% av tí sum teir høvdu í veð í hesum her skipunum. Vit hava so broytt hesa reglugerina soleiðis, at teir fáa síni 100%, men hesir stovnar áttu ógvuliga lítlan part í hesum 18 skipunum, tað tyngdi so landskassan við 2,5 mió.kr. afturat og har afturat fingu vit ekkum eina heimild til, at um skip sum landskassin kanska hongur í nógvum pengum upp á, fara konkurs, so kunnu vit keypa tey á tvingsilssølu um vit halda at tað er skilagott og fáa tey burtur úr flotanum upp á tann mátan. So at tann tilsøgnin, sum tað landsstýrið gav, tað arbeiðir umsitingin við í løtini og avgreiðir tey málini. Vit ætla at gera eina aðra reglugerð fyri upphøgging og hon er í høvuðsheitum øðrvísi í tann mun, at tann fyrra hon letur 80% av skuldini í hesum ávísu skipunum, vit ætla, at henda komandi skal í høvuðsheitum, har skal man gjalda fyri veiðiorku sum fer út úr flotanum og kanska eini onnur 2 kreterier soleiðis, at um skiplð skyldar nógv ella lítið, tað kemur ikki sakini við. Men har kunnu koma ymisk onnur viðurskifti, við t.d. hvat fyri slag av skipum skal man taka burtur úr flotanum, hvussu skal mynstrið verða o.s.fr. skulu vit taka trolarar út, skulu vit taka línuskip út ella útróðrabátar, tað verður so ein spurningur. Ein annar spurningur er eisini, hvør skal eiga skipi, tá ið fiskiloyvið er keypt av landsstýrinum, skal landsstýrið tá eiga skipið ella skal viðkomandi sum átti skipið frammanundan framvegis eiga skipið, men við tí munandi, at tá hevur skipið einki veiðiloyvi hevur, so kann hann so brúka tað til okkurt annað ella selja tað út av landinum, tað eru hesi tingini sum vit arbeiða við og vit fara at finna fram til eina niðurstøðu. Tað var háttvirdi tingmaður Jógvan Durhuus sum spurdi um rakstrarstaði 11086 sum er sjóvinnuráð um fyrireiking av sjóvinnufyrisiting. Hann fanst at, at har vóru eingi fylgiskjøl til hatta punkti í uppskotið til fíggjarlóg og hatta er eitt nýtt rakstrarstað og tað er sjálvandi beklagiligt at tað ikki finst nakað fylgiskjal við har. Men tað er soleiðis, at landsstýrið hevur í 1 ár, arbeitt við at seta í gildi sjóvinnulóginar sum løgting-

ið samtykti í 1988, partar av løggávuni eru settar í gildi. Nevnast kann sjóvinnulógin frá 1. juni 1989 og manningalógin frá 1. juli 1989. Sjómanslógin kann væntast at verða sett í gildi komandi vár. Hetta drúgva lógarverk setur stór krøv til umsitingina, sjóvinnuráðið er skipa, men tað er ikki farið til verka vegna tørvandi játtan. Tá ið landsstýrið samtykti at seta manningarlógina í gildi, var samstundis søkt til fíggjarlógina um eykajáttan fyri 1989, hetta mál er ikki avgreitt enn og liggur í fíggjarnevndini. Tann upphædd sum er sett í fíggjarlógaruppskotið til sjóvinnuráð og sjóvinnufyrisiting, er helst ikki nóg mikið til at røkka málið, soleiðis sum skyldir okkara eru sambært sjóvinnulóggávuna og fyri at lúka tey krøv ið verða sett okkum frá vinnulívinum og í millumlandasamstarvi, men tað er sum ein byrjan í tráð við ta fyrireiking sum landsstýrið arbeiðir við á hesum øki. Endamálið er, at samskipa alla sjóvinnuumsiting sum er í landinum soleiðis, at ábyrgdin kemur at liggja á einum stað og upphæddin sum landsstýrið skýtur upp, er soleiðis funnin innan fyri verandi fíggjarkarmarnar. Eg kann eisini nevna, at uppi í hesi millióninni har er t.d. nautiskt royndarkamar sum fyrr plagdi at standa fyri seg og eisini eru partar av umsitingini til skipaeftirlitið. T.d. er okkurt um uppmátingina av skipum. Uppskotið sum landsstýrið fekk frá umsitingini, tað var tilsamans upp á 2.242.000 kr. og har skuldu setast 4½ fólk til hasa umsitingina, tað var uppskotið men tað er so sett við 1 mió.kr. og so er tað eisini minni fólk, tað var tað um hatta. Tað var eisini sami háttvirdi Jógvan Durhuus sum spurdi um streymmátingarnar í Vestmannasundi í samband við eitt orkuverk drivið av streymi. Har hevur gingið illa í hond við hesum streymmátingum, teir fingu ein streymmátara frá Noreg og nú veit Jógvan Durhuus nokk nógv meir enn eg, hann er meir inni í hasum málinum. Hann bleiv nokk søktur niður á botn og eg veit ikki um hann er fortoyðaður eitt sindur uppi og tá ið hann so bleiv uppaftur tikin og tá ið tíðarskeiði var liti, so hevði hann einki sagt, tað var einki skrivað, so bleiv hann skiftur út við ein annan sum eisini bleiv settur har og hann stóð so sína

tíð og so tá ið hann bleiv uppafturtikin, tá hevði hann bara skrivað nakrar tímar. Tað er eitt norskt firma, sum eigur hesar matarar, og teir siga seg nú hava funnið feilin og teir vilja so leggja ein annan niður í september ella oktober soleiðis, at man fær gjørt hasar kantstreymmátingarnar.

Tað hevur onkur spurt um hvussu tað stendur til við játtanum til minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna. Mær er sagt, at Hergeir Nielsen spurdi um, hvat forbrúkið var og hvat man ætlaði komándi ár. Vit hava tølini viðvíkjandi nýtsluni á konto fyri mynstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna, tað er ein uppgerð frá lønjavningargrunninum 31. august og tá hevur ráðfiskagrunnurin brúkt 138 mió.kr. og á játtanini stendur 206 mió.kr. Og studningsnevndin hevur brúkt 103 mió.kr. og játtanin er 170 mió.kr. Og minstaløn v.m. eru brúktar 21 mió.kr. og á játtanini eru 50 mió.kr. Tað vil siga, at tá eru brúktar 162 mió.kr. á teimum rakstrarstøðunum og játtan er fyri 426 mió.kr. Hetta sýnir so, at tað eru 62% brúkt sambært henda roknskapin, men hinvegin so er útgjaldingin altíð nakað seinkað, tað er aftur eitt eftirsleip og metast kann, at veruliga nýtslan er millum 66 og 70% sum er tað sum var vanta. Peningur skuldi sostatt eisini verið til at ráðfiskagrunnurin kann áseta ábroyttar prísir fram til ársskiftið ella fram ti 1. februar 1990. Teir skulu seta prís í næstu viku fyri næsta 4 mánaðar skeiði og somuleiðis kann studningsnevndin halda seg innanfyri sínar játtanir og áseta studningar sum merkja, at fiskiflotin ikki skuldi blivi verri fyri, enn hann er í løtini. Men, her er so ein annar spurningur, sum hevur tikið seg upp og tað er viðvíkjandi skiftisavlopinum til flakavirkini. Tað er soleiðis, at ráðfiskakeyparnir kærdu ásetingina seinast og fingu viðhald og tá var skiftisavlopi 1,68 kr. Og tað bleiv tá sett upp í 1,88 kr. og um teir skuldu fáa fult endurgjald, so skal skiftisavlopið eftir útrokningini hjá teimum upp á 2,26 kr. og tað vil so kosta ráðfiskagrunninum íð hvussu so er einar 20 mió.kr. afturat í hesum síðsta kvartalinum, so at tá fer at standa á tí játtanini sum er til tað endamál. Hvussu tað

skal býtast komandi ár, tað hevur man ikki onn tikið støðu til. Eisini hevur verið spurt um uppboðssøiu, tað stendur í samgonguskjalinum, at vit skulu gera royndir viðvíkjandi uppboðssølu, nú navi eg fyrr sagt, at eg havi ikki nakað serligt álit til eina uppboðssølu í Føroyum, soleiðis sum hon vanliga er skipað í øðrum londum, men tað stendur í samgonguskjalinum, at vit skulu royna hana og tar havi eg hug til, at man kundi roynt eina telefoniska uppboðssølu, tað vil siga, at man upprættar eina skrivstovu sum hevur samstarv við flakavirkini og skipini sum eru til fiskiskap tey seta seg so í samband við hesa telefonisku uppboðssøluna og siga, at vit koma inn tá og tá og vit hava toy og tey fiskasløg og hvar kunnu vit fáa besta pris og so setur kenda skrivstova seg í samband við flakavirkini og spyr eftir prísum út um landi. Hatta er vælkent t.d. í Noreg og mær er fortalt at man eisini hevur brúkt tað í Íslandi. Hatta vildi ikki kosta nógv og man kundi skjótt rigga tað av aftur, um so er at tað ikki ber til, men tað er nú soleiðis í Føroyum, at nógv skip eru tengd til ávís flakavirkir, men nakað av skipum eru leys, og tað vildi kanska gjørt tað, at man fekk ein betur pris, lá hvussu so er skuldi hatta animera menn til at hava eina betur vøru, soleiðis at tá eitt flakavirki hevur fingið fiskin frá einum skipi, so veit tað hvussu menninir viðgera fiskin, hvat fyri góðsku teir kunnu rokna við og soleiðis kunnu skip koma í gott orð og táa ein hægri pris og hatta hevði ikki verið so nógvur ómakur av at roynt hatta har, og hatta kundi eg so tilrátt at vit gjørdu í fyrstu syftu. Annars havi eg lagt til merkis, at fleiri hava nevnt, at á grein 16, fiskivinnusigling har er ein vøkstur frá 425 mió.kr ti 556 mió.kr, og tað er ein stórur vøkstur, men hetta gevur ikki eina heilt ratta mynd, tí tann veruliga játtanin til grein 16 er í ár 605 mió.kr, tá íroknað er tann eykajáttan sum bleiv viðtikin í summar. Hetta tal, upp á 605 mió.kr, verður eftir uppskotinum fyri komandi ár, lækkað við 50 mió.kr, til 555 mió.kr, næsta ár, so her er ein stórur niðurskurður til fiskivinnuna komandi ár í mun til árið í ár, tá eykajáttan er íroknað.

Harra formaður. Vit vita, at okkara vinnulív er illa fyri, og fiskivinnan, sum er størsti partur av okkara vinnulívi er sera illa fyri. Henda støða í fiskivinnuni er ikki komin á frá einum degi til annan, men hevur nært um seg gjøgnum fleiri ár. Fiskivinnuráðið hevur við nágreiniligum tølum sagt frá, at undirskotið hjá fiskiflotanum hevur verið upp á móti 100 tals mió.- kr. um árið. Hetta undirskotið hava so bankarnir fíggjað. Teir hava verið væl fyri orsakað av ellunteimum uttanlandalánum sum eru komin inn í samfelagið og teir hava eisini sett nógvar pengar av til vantaða tapið av fiskiflotanum. Eisini landskassin hevur fingið sín stóra part av hesum lánum gjøgnum avgjøld og skatt av teimum nógvu pengum, sum komu í umfar í samfelagnum. Nú hava útlendsku lángevarnir skrúðað nokk so nógv fyri cg gjaldføri hjá bankunum er fjarðað burtur. Teir hava ikki longur ráð til at fíggja undirskotið hjá fiskivinnuni og falittir eru nú dagligur kostur hjá okkum. Lítil fiskur er at fáa, serliga á heimaleiðunum, fiskirættindini á øðrum høvum er minkað og fiskaprísurin er lágur. Landskassin er dagliga í fíggjarligum trupulleikum og livur frá hondini í munnin og tað er heilt greitt, at tá hesi ting fella saman, so koma vánaligu ringvirkningarnir at gera vart við seg gjøgnum alt samfelagið, tí tað er innløga til samfelagi, tað vil siga, at tað er vinnulívið sum uppiheldur alt og øllum, fíggjarliga tá ið saman um kemur. Nú eru vit mennisku ein løgin skabningur. Søgan vísir, at vit kunnu yvirliva við næstan lítið og einki. Hinvegin so vísir tað seg eisini, at einki mark er fyri, hvat vit kunnu forbrúka. Vit eru nú í eini støðu, hvar vit hava minni ráð til forbrúk og tað er henda støða vit eiga at gera okkum greitt og handla út frá og fara til verka, fyri at fáa okkara landshúsarhald aftur í javnvág til fragd og sóma fyri okkum øll. Í hesum sananhangi, eiga vit at royna hvat vit kunnu fyri at fáa fiskivinnuna á eitt meir gevandi støði, og tað arbeiða vit við. Eg ætli mær ikki at fara at útgreina her í dag. Tað manglar eina viðgerð í samgonguni og millum ymsar partar, hvat tað er vit skulu
gera, men man kann siga, at vit hava vaska ullina og vit

have karað, vit vóna ikki, at trøllið, um trøllið hevur skegg, sum bara karaði gráa og so skulu vit spinna og binda eitt gott mynstur sum vit kunnu brúka fram yvir, men eingin skal vanta sær nakað undirverk frá einum degi til annan, hetta verður tungt at koma í gjøgnum og eg síggi fram í móti einum tungum landsstýrisskeiði við torførum og umtóktum avgerðum, men hetta má eitt so eisini taka við, tá ið man er uppi í politikki. Takk fyri.

Atli Dam (jv.)

Herra formaður.

Eg endaði fyrra umfar mítt, við at taka upp tað sum Anfinn Kallsberg, figgjarnevndarformaður, tá endaði við, nevndiga hesum vandanum fyri at koma undir administration av øðrum og vísti á, at tað er ein spurningur um hetta ikki longu er hent ella er við at henda ið hvussu so er tá ið statsministarin Poul Schlüter er farin at leggja seg nógv meir út í føroysk búskaparviðurskiftir. Hetta er kanska ikki so løgið kortini, tá ið man hugsar seg um og kennir grundina og bakgrundina, sum danskarar siga, so skal hon partvís søkjast í tí sum tað landsstýrið, sum legði frá sær í juni, við løgmanni á odda líka sum næstan hevði biðið um hesa uppílegging frá danskari síðu. Eg undraði meg yvir í juni mánað at ráðgevandi nevndin var vorðin so ágangandi viðvíkjandi Føroyum, at hon beinleiðis legði seg upp í tann politiska útviklingin og metti, at val skuldu vit so ið hvussu so er ikki hava í føroyum tá, og sjálvsagt mótmælti eg hesari óhóskandi uppílegging á røttum stað, men eg skilti tá, at grundin til, at tað landsstýrið og hetta sum nú er komið, tey tvey sum vit hava havt higartil í ár, hava drigið forsætismálaráðharran munandi meir upp í, tað er grundin til, at ráðgevandi nevndin soleiðis óhóskandi leggur seg upp í, tí statsministarin hevur av hesum sjálvsagt fingið brúk fyri øktari rúðgeving og leiðbeining um føroysk viðurskifti, tí hevur hann økt um arbeiði hjá hesi nevnd soleiðis at nú frættist, at hon heilt ekstra ordinert aftur kemur

til Føroyar fyri aðru ferð í ár í oktober ella november og eg vil pástanda, at hesi bæði landsstýrini soleiðis sæð hava annað hesa donsku uppilegging upp á okkum á ymsan hátt og partvíst kanska í eitt sindur ótaktiskari politiskari telving. T.d. tá ið statsministarin fann tað fyri gott, at snara fyri møguleikarnar fyri at læna úr kommunukreditforeiningini. Eg hevði ið hvussu so er, um eg sat í landsstýrinum ypt øks og funnið aðrar útvegir, heldur enn farið niður og biðið statsministaran um at broyta hesa avgerð, ti fylgjan av tí, hon bleiv sjálvsagt tað, at tá ið man kom heim aftur við hesum avslagnum, so snaraðu teir føroysku bankarnir sjálvsagt fyri dagin eftir, teir skrúðaðu fyri dagin eftir og soleiðis hevur tað so bitið seg sjálvt í halan ella tann eina fylgjan dregur aðra við og vit eru komnir í hesa støðuna sum vit eru komin í búskaparliga eftir heilt heilt stuttari tíð. Grundin til, at eg taki hetta fram nú, tað er, at eg fegin vil vita, og haldi, at tingmenn hava krav upp á, at vita hvussu fíggjarnevndin kanska. Hvørjar treytir, ella eru treytir knýttar at tí økta møguleikanum fyri at trekkja í Tjóðbankanum 300 mió.kr. í staðin fyri 100 mió.kr. Sum sagt, tann eina fylgja dregur aðra við sær og tann bragdligheit sum tað fyrra landsstýrið legði út við, hon gjørdi sítt og tað bleiv ikki frægari av, at Pauli Ellefsen fekk høvi til, sum eg seðgi í mínum fyrra innleggi at lancera nakrar fiksar idéir soleiðis, at vit fingu skattahækkingar, tollhækkingar og hesar fultkomiliga óavvigaðu uppbremsingina viðvíkjandi virksemi. Tað skal nú einaferð longri bremsilongd til ein bil sum koyrir við 120 km/t enn einum sum koyrir 50km/t. Í og fyri seg, var tann minking í virksemi sum byrjaði á sumri 1988, hon hevði helst verið nóg mikið til at vit fingu eina hóskandi legu, í staðin fyri tað sum vit nú fáa, sum eg vísti á, sum ger, at vit ikki fáa hesar pengarnir inn og tollurin minkar o.s.fr. soleiðis, at vit stýra inn í eina heilt betíðulga likviditetskreppu fyrst í 1990 aftur. Nú hevði Pauli Ellefsen á munni í gjár, at allir flokkar vildu skattahækking fyrr í vár. Tað er ikki beint, orsøkin til, at hann sigur tað at Javnaðarflokkurin vildi

skattahækking ella at eg havi sagt, at tit skuldu heldur verið menn og givið tí sum er hent tað rætta navni tað hevur, nevnliga eina skattahækking heldur enn at kalla tað eina sokallaða bundna uppsparing sum skal gerast um til ein pensión, tí sum eg havi sagt fyrr, tað ber nú ikki til, at brúka teir somu pengarnir fleiri ferð. Skulu hesir gjaldast út aftur í 1992 so skulu teir krevjast inn hálva aðru ferð aftrat, alsø tvær og eina hálva ferð. Ídeina skal skattaborgarin gjalda hesa fiksu ídéina at kalla tað nakað annað enn tað sum tað er, so tann ótrúgligi arroganssi hetta er gjørt við. Eg vil heita á samgonguna um at fáa tikið seg saman til at taka støðu til, hvussu skulu pensionistar viðgerðast viðvíkjandi hesum her. Nú hevði Vilhelm eina stuttliga søgu at fortelja um eina 80 ára gamla konu, sum fekk at vita, at hon fekk pengarnir aftur tá ið hon fylti 65 ár, tað blívur hon so ikki í hesum lívinum, men tað er ikki so stutligt. Eg haldi ikki at tað er so stuttligt hjá nógvum av hesum fólkunum, tey fáa einki at vita. Hví kunnu tit ikki taka tykkum saman til at siga, hvussu tað skal verða. Eg haldi meg minnast, at Pauli Ellefsen undir hinari viðgerðini segði, at tey sum vóru yvir 65 ár tey skuldu ikki luttaka í hesum, meðan Jógvan Sundstein sjálvsagt sum tað stendur í lógini í fyrstu syftu, skulu tey so rinda ið hvussu so er tað fyrsta árið, men eg haldi, at hevur man fingið hatta at fungera eftir so stuttari tíð, so nátti man eisini fingið tað at virka hjá teimum sum eru komin skeivt fyri í systeminum. Síðan hevur Pauli Ellefsen ferð eftir ferð spurt, hvat vildu tit í andstøðuni gjørt um tit nú skuldu skaffa hesar pengarnar. Eg haldi ikki at tað tilkemur Pauli Ellefsen at spyrja tí sjálvsagt hava vit ein heildarpolitikk, vit fara ikki at pilka brot burtur úr og siga, at í staðin fyri, at taka so og so nógvar mió.kr. skulu vit taka so og so nógvar, vit skuldu fyri tað fyrsta syrgt fyri, at vit ikki komu í hesa støðuna og fyri tað næsta, so kunni man tosa um hesi tingini út frá einum heildarpolitikki og tað gjørdi Javnaðarflokkurin eina roynd til í samband við viðgerðina av fíggjarlógini fyri inniverandi ár 1989 og henda heildarpolitikk vilja vit til eina og hvørja

tíð verja og royna at fáa framda. Men harvið verður ikki sagt, at vit ikki í fíggjarnevndini vilja verða við til at umhugsa sparingar, tí tað er klárt, at bremsast skal nakað í viðvíkjandi peninganýtslu, men bara ikki upp á henda mátan. tað kann ivaleyst sparast nakað, men langt í frá tað sum menn her fyristilla sær á teimum trimum økjunum heilsuverkinum, skúlaøkinum og viðvíkjandi strandferðsluni tað ivist eg í, men tað sum her er skrivað eitt nú viðvíkjandi heilsuøkinum, tað vísir, at menn als ikki hava viðgjørt hetta, tí sparingin á Suðuroyar sjúkrahúsið t.d. hon kann sjálvsagt ikki verða í procentum tann sama sum á sjúkrahúsinum í Havn, tað er reelt eini 50% sparing ið man biður um, men skal man spara tann eina laborantin burtur sum er og bara hava ein hálvan eftir, eg veit ikki hvussu tað gerst og skal man spara annan av læknunum burtur av teimum tveimum sum eru, so er bara ein eftir og so fungerar tað ikki. So hasar mió.kr. fáa tit ikki, tit koma at viðurkenna, at sjúkrahúsið skal fungera. Man kann taka ta avgerð at tað skal niðurleggjast, tað er klárt, men tað er munur á, at spara av tveimum læknum og at spara av nøkrum í 30 ella 50 ella 6 og 7 sum tað er í Klaksvík, so hatta ber ikki til, at seta eitt slíkt procent og siga, at hatta hava vit spart í ár, tað gongur ikki. Tað er so ógvuliga nógv sum ivirhøvur ikki kemur at ganga. Annars er tað nokk so paradoksalt, bæði Anfinn Kallsberg og Jógvan Sundstein tosa um, at lækka umkostningsstøði og økja kappingarføri hjá føroyingum, men fyri at gera tað, má man fyrst fremja tað størstu devaluering av lønarkrónuni sum nakrantíð er framd í Føroya søgu. Man gav nakrar rættiliga munandi lønarhækkingar í vár. Sagt verður í løgmansrøðuni, at tað var nest fyri frið skyld, men so undir skeivum forútsetningum, so boðar man frá í góðari tíð, at nú skal prístreðgur koma, eitt sum man veit er ómetaliga torført at gera í praksis soleiðis, at vøran dýrkar. Hava tit ikki lagt merki til, hvussu nógv vørurnar eru dýrkaðar bara í august mánaði bara síðan hetta bleiv proklamerað. Alt hetta kemur at økja um raksturin oisini hjá tí almenna, hjá flakavirkjunum hjá øllum samfelagnum, so tað er nokk so paradoksalt, at man skal

frøkja tað størstu dýrkingina fyri at blíva kappingarførur og upp á sama máta sum man skal ganga so ógvuliga nógv í gjøgnum líka sum í ævintýrunum viðvíkjandi fiskivinnunni áðrenn at kann blíva so sára gott. Nú tosar Jógvan Olsen so sakliga um hvat hann ætlar at gera, og sigur, tað verður ikki eftir einum degi og so framvegis, men eg haldi, at tað er farið rættiliga ætt um, bæði í fíggjarlógini og í løgmansrøðuni. Men í fyrsta umfari mugu vit also økja studningin til fiskivinnuna heilt munandi fyri at tað skal blíva gott seinni, so tað merkir, reelt sæð, at her er eingin sparing í hesi fíggjarlógini, her er eingin sparing, man hevur skorið tilvildarliga niður á nøkur økið og so borið tað yvir á onnur økið og so far man nakrar heilt órealistiskar samanberingar við forbrúkið í 1989. Skal man taka ta lántøkuna sum landsstýrið hevur tikið fyri 1989, ja, so skal man eisini taka ta lántøkuna sum tað verður neyðugt at taka í 1990 og so skal man taka allar lántøkur og ikki bara pengarnar frá skattaborgarinum. Takk fyri.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Tað er nú komið fram, at tann 80 ára gamla konan í Klaksvík hon flenti at Vilhelm Johannesen tí hon dugdi lógina um bundna uppsparing, og Atli Dam er heldur ikki sikkur í tekstinum, hon kendi hann. Tað sum eg vil við pensionistunum, tað er tað, at tað stendur í lógini, at man fær útgoldið henda 1989 peningin tá ið man er 65 ár, tó fyrst eitt ár aftan á, at lógin er komin í gildi. Men aftan á 1989 so luttaka pensionistar í uppsparingini eftir vanligum reglum.

Tað var Atli Dam sum undraðist yvir, at hesi bæði landsstýrini, sum hava verið hava nærkast statsministeriið so nógv og har má eg siga, at eg eri ikki sikkur í tekstinum, eg kenni ikki so nógv til hatta har. Men tað kann ikki undra meg, at statministeriið sum lángevari kann man gott siga, til Føroyar í dag kannar málið tá man hevur tað í huga, at Atli Dam longu ultimo 1984 fór niður til Danmarkar og í alt jóða pressuni tilnevndi

Føroyar sum bananrepublik at verða, tí gongdin síðan tá síðan vit blivu bananrepublik í Atla Dams eygum hon hevur verið syndaralig. Svarið frá Atla Dam upp á spurningin um hvat ætlar andstøðan at gera, ja, men tað tilkemur ikki Paula Ellefsen at fáa tað at vita, hvat Javnaðarflokkurin hevur í hyggju at gera fyri, at loysa hesar trupulleikarnar, tað er ein duldur politikkur, men so mikið verður viðgingið, at Javnaðarflokkurin hevur ein heildarpolitikk, men hvat tað er fyrí ein, ja, tað bæði vita vit og vita vit ikki, tí vit kenna heildar politikkin inntil í dag, nevnliga tann heildarpolitikkur sum hevur fingið okkum í hesa støðu við eru í dag. Samantakið hjá Atla Dam var, at sjálvandi vilja vit í fíggjarnevndini umhugsa sparingar, tað vóru orðini. Eitt samfelag við eini nettoskuld upp a 7 mia.kr. við einum bruttoútflutningi upp á 2 mia.kr. við eini fíggjarlóg upp á 3,2 mia.kr. har vil størsti andstøðuflokkur umhugsa sparingar í fíggjarnevndini. Eg haldi, at hatta sigur alt.

Løgmaður Viðmerking

Harra formaður.

Atli Dam hevur fleiri ferðir bæði í hesi røðuni og í tí fyrru røðuni tosað um, at hetta landsstýrið bara lýður harraboð frá Poul Schlütter, also frá statsministarinum og vil líka sum siga tað, at tað er hann sum stýrir øllum hesum her. Eg skal allarfyrst upplýsa, at síðan eg bleiv løgmaður havi eg tríggjar ferðir hitt statsministaran, fyrstu ferð, tað var saman við varaløgmanni Signar Hansen hvar vit vóru ein høflighetsvíset og vitjaðu hann, aðru ferð var undir meir privatum formum við eina veitslu í Norðurlandaráðnum í Stockholm hvar vit einki tosaðu um føroyskan politikk og triðju fer var í samband við, at vit fingu boð um, at staturin ikki longur vildi veðhalda fyri láni til føroyskar kommunur. Undir hesum samrøðunum, fekk eg at vita, at hetta var nakað sum statministeriet gjørdi, tí at teir vildu av við hesa regluna. Finansministeriet hevði givið boð um, at teir ikki ynsktu, at ein slík skipan longur var

galdandi, tí at hon var ikki galdandi fyri danskar kommunur. Hatta var nakað specielt sum var komi í 1950-unum og teir hildu, at tað ikki hoyrdi heima longur og tí vildu teir hava tað avtikið og tað hava vit eisini gjørt avtalu um, at tann lógarbroytingin kemur í tað donsku lógina um hatta og so mugu tær føroysku kommununar sjálvar finna út av um kreditforeiningin vil læna pengar til tær, so har er einki annað og kenni eg onga stýring frá tí danska statsministeriunum av tí føroyska samfelagnum ikki so vítt landsstýrinum kunnugt í øllum førum. Eg havi eina aðru fer verið í statsministeriunum, tá var statsministarin ikki har, 1 ár og tað var í samband við umsøknina um at hækka trekkið í Tjóðbankanum frá 100 mió.kr. til 300 mió.kr. Í tí brævinum sum vit fingu aftur hvar tann játtanin var givin, har stóð, at tær 200 mió.kr. sum hækkingin ljóðaði upp á verða forrentaðar við 9% meðan tær fyrru 100 verða forrentaðar við 7% og annars, at Tjóðbankin heldur, at føroyingar eiga at læna á tí vanliga láninarknaðinum heldur enn at læna í Tjóðbankanum. Tað stendur í brævinum og tað skal sjálvandi ikki verða nakað dulsmál tá ið tað brævið er sent og tað eri eg ósamdur í, eg meini, at so leingi danski Tjóðbankin er samstundis tjóðbanki hjá Føroyska landskassanum so eigur man at hava nøkur tilsvarandi rættindi sum tann danski statskassin hevur í danska Tjóðbankanum, men tað havi eg ikki enn svara upp á, eg havi vilja umhugsa hetta her eitt lítið sindur áðrenn vit geva tey boðini aftur, men har er ikki beinleiðis sett nøkur tíðarfreist á.

Karin Kjølbro (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var til seinasta ærað røðara í nevndi hetta sum størsta ágang nakrantið, tær inntøkulógir sum nú eru. Til hetta er at siga, at Atli Dam, um hann var her fyrrapartin, kundi fingið at vita, at tær inntøkulógir ið framdar vóru í 1980 undir leiðslu av Atla Dam, tær vóru 103 mió.kr. av eini fíggjarlóg upp á 650 mió.kr. tá uttanlandsskuldin var tað sama sum fíggjarlógin. Hetta

var so mikið sum 15% av táverandi fíggjarlóg. Tað sum vit hava tikið inn nú í summar sum einki er at reypa av treyðugt so tað er tað als ikki, tað eru 7,5% av okkara fíggjarlóg sum er 3,2 mia.kr. eg havi rokna niður til 2.500 mió.kr. tí blokkurin skal ikki verða upp á og uttanlandsskuldin er meir enn tað dupulta av okkara fíggarlóg
so har er ein tøkur munur og ágangurin má sostatt hava verið tvær ferðir so stórur í 1980 sum hann er nú í 1989. Harra formaður. Tað næsta, tað er hetta sum vit hava hoyrt um fleiri ferðir, at vit láta okkum umsita av statsministarinum. Tað sum er vert at nevna í hesum sambandi, tað er, at tann blokkstuðul ið vit fáa, hann er ikki meir enn til at rinda fyri renturnar av tí uttanlandsskuld sum vit hava. Er tað løgið, at tann sum rindar hevur áhugað fyri, hvussu vit uppføra okkum, tá vit hava fingið tað at vita ferð eftir ferð, ikki bert frá donskum vísmonnum, vit hava ikki tikið við læru, men eisini frá okkara egnu búskaparfrøðingum. Eg haldi, at vit skulu takka fyri, at hetta blívur ikki við at ganga.

Jóngerð Purkhús (tí.) viðmerking

Harra formaður.

Nú hava vit sitið her í 2 dagar og lurtað eftir hesum orðaskiftinum og eg má siga, tað, at Atli Dam gjørdi meg eitt sindur forvitnan nú her í kvøld. Hann tosaði um, at Javnaðarflokkurin hevði ein heildarpolitikk. Tað hava verið so nógvir javnaðarmenn og kvinnur uppi á røðarapallinum og ikki havi eg uppdagað nakað slíkt. Kann hann ikki gera so væl og lyfta lokið eitt lítið sindur, so vit fáa at vita.

Lasse Klein (sf

Harra formaður.

Eg legði merki til, at tað sum verður tosað um her í samband við inntøkulógirnar, tað verður bara tosað um tað burðnu tvungnu uppsparingina, men tollhækkingar-

nar sum tit hava frant i hesum tíðarskeiði tær skal ein vanlig familja gjalda í millum eini 6 og 8.000kr. árliga omar á tað tvungnu uppsparingina. Nú er ringt at finna út av, nær hesin peningurin skal útgjaldast aftur. Pauli Ellefsen upplýsir, at pensionistarnir teir luttaka í bundnu tvungnu uppsparingini í sama mun sum øll onnur og tað sum eg havi spurt, tað sum fleiri fólk eftirlýsa, tað er, nær fáa tey fólkini, sum hava fylt 65 ár útgoldið tað
bundnu tvungnu uppsparingina. Í lógaruppskotinum stendur, í fyrsta lagi 1 ár eftir, at henda lógin er komin í gildi, men Pauli Ellefsen sigur, at tey luttaka í sama mun sum øll onnur, so tað kundi verið nokk so áhugavert, at fingið at vita, nær hesin peningurin skal útgjaldast og um tað yvir høvur er neyðugt, at leggja bundna tvungna uppsparing á fólk sum hava fylt 65 ár, tað var ikki tey tað var ætlað til, og tí kundi eg hugsa mær, at fíggjarmálaráðharrin svaraði upp á hasar spurningarnar.

Atli Dam (fv.) viðmerking

Handa góða bananrepublikkin, hon verður brúkt ómetaliga nógv. Um Pauli Ellefsen vildi verið eitt sindur erligur og hugsað seg um, eitt sindur aftur í tíðina, so veit hann, at um mánaðarskifti januar/februar í 1985, avsannaði eg alment hasi tíðindini, at eg hevði útnevnt Føroyar til eina bananrepublik, men tit sum hava brúk fyri hasum har, gerið so væl og haldið bara fram. Sjálvsagt skulu sparingar umhugsast, umhugsing er neyðug fyri at fremja realistiskar sparingar, tað er tað sum eg vildi vísa á, men sjálvsagt, Pauli kann brúka alt, til at sláa tingini upp í gleins, tí fyri hann er meginparturin av hesum spæli. Eg vildi vísa á, at tær uppskotnu sparingarnar í fíggjarlógini í fleiri førum als ikki eru umhugsaðar, tær eru so órealistiskar, at tær koma ikki at lata seg gjøgnumføra. Tað skulu vit nokk verða við til at hjálpa uppá. Eg spurdi Jógvan Sundstein, hvørjar treytir vóru í samband við tann økta trekningsrættin og er tað tær einastu treytirnar handa broytingin í rentusatsi, so kanska man kann verða róligur og annars eri eg

púra samdur við Jógvan Sundstein í, at vit skulu ikki uppgeva handa Trekningsrættin, hatta er nakað sum vit sjálvsagt eiga og skulu ikki finna okkum í, at verða stýrd út á privata lánimarknaðin viðvíkjandi tí náttúrliga likviditetsbjálgi, sum ein landskassi skal hava, upp á sama máta sum statskassin hevur.

Til Karin Kjølbro vil eg bara siga tað, at um tær tollhækkingar, tá var bara talan um tollhækkingar og ikki skattahækkingar, sum blivu gjøgnumførdar, tá vóru 15%, so standa tær við í dag og 7,5% aftrat 15%, tað má blíva
tað vesta sum nakrantíð er gjøgnumført. At forlanga tað, at eg upp á kvart minutt skal vísa ein heildarpolitikk, um Jóngerð Purknús vildi, so velt hon hvørji tiltøk vit hava mælt til, hvørjar skeivleikar vit hava víst á, men hon hevur ikki brúk fyri at góðkenna hetta, hon hevur ikki brúk fyri, at tað finst ein samlandi sosialistiskur politikkur, sum kundi verið brúktur í hesum førum, í staðin fyri tann borgarliga høgra politikk sum tit nú eru farin yvir til.

Jákup Lamhauge (sb.)

Harra formaður,

Sum øllum kunnugt, so hevur politiska støðan í Føroyum, síðan løgtingsvalið síðsta heyst, verið ógvuliga ótrygg og hevur hetta millum annað havt við sær, at Løgtingið fyrst nú, 10 mánaðir aftan á valið hevur fyrsta veriliga orðaskiftið um tann politikk sum sitandi Landsstýrissamgonga hevur sett sær fyri at reka. Sitandi Landsstýrissamgonga millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin sum var skipað í summar, aftan á, at aðrir samgongumøguleikar vóru miseydnaðir setur sær sum aðalmál, at rætta upp á risastóru figgjartrupulleikarnar sum undanfarna samgonga førdi hitt føroyska samfelagi í. Løgmaður hevur í sínu røðu á ólavsøku greitt løgtinginum og Føroya fólki frá trupulleikunum í samfelagnum samstundis sum sagt verður frá, hvørji stig samgongan ætlar at taka, fyri at rætta upp á skeivleikarnir.

Um búskaparligu gongdina, sigur løgmaður m.a., at uttanlandsskuldin við ársbyrjan í 1988, var 6,7 mia.kr. ein ábending um, at verið hevur eitt ógvusligt gjaldsjavnahall undanfarna samgonguskeið. Landskassans útreiðslur hava verið vaksandi, ja, í so stóran mun, at sjálvt við eini meir inntøku upp á 180 mió.kr. so var einki avlop á roknskapinum fyri 1988. Veðhaldsútlegg landskassans fyri 1988 og fyrra helming av 1989 hava verið 408 mió.kr. og her er vert at leggja til merki, at samlaða upphæddin til effektivar veðhaldsbindingar sum so var avsett í 1988 og 1989 einans var 155 mió.kr. Við øðrum orðum, at her írestar ein kvart mia.kr. plus tey útlegg ið koma í seinnu helvt av 1989. Likviditetur landskassans er út av lagi váhaligur og øll tekin eru á luftini um, at her koma at tørva 100 tals mió.kr. og saman við øllum hesum sum nevnt er, hava vit so høvuðsvinnu okkara fiskivinnuna sum er ógvuliga illa fyri, og tørvar henni stóra peningaupphæddir um vinnan skal verða før fyri, at halda fram. Sum øll vita, so er sitandi samgonga samansett av politiskum flokkum sum annars eru ólíkir í teirra stevnumiðum, men kortini, so eru hesir flokkar gingnir saman í felagsskap til tess, at virka fyri, at rætta upp á tað føroyska landshúsarhaldi soleiðis, at tað aftur kunnu fáa trygg fíggjarlig viðurskiftir í landinum. Men upptøkan er ikki løtt og krevur tí nógv av hvørjum einstøkum samgongumanni um arbeiði skal eydnast. Tiltøk sum hækkaðu tollgjøld, bundin uppsparing og niðurskurðir í fíggjarlógini eru eingin fegin um, og heldur ikki sitandi samgongumenn og kvinnur, men hetta eru stig sum eru alneyðug um vit aftur skulu fóta okkum fíggjarliga. Eg vil í hesum sambandi fegin undirstrika, at eg vóni, at ið hvussu so er samgongumenn í fíggjarnevndini halda fast við tey sparitiltøk sum landsstýrið hevur skotið upp
og tikið verður undir við teimum lógarbroytingum, sum mugu til, tí tað má verða eitt minsta krav frá skattaborgarinum, at tann peningur sum tikin verður annað hvørt við skatti, tolli ella uppsparing verða væl umsitin og brúktur við skili. Eg veit væl, at fleiri stovnsleiðarar hava kært til landsstyrið um sparitiltøk-

ini og hava víst á vandan fyri lækkandi tænastustøði. Tað er júst hettar sum Føroyingar nú noyðast at liva eina tíð um vit attur skulu verða førir fyri at fóta okkum. Vit mugu øll luttaka í hesumarbeiði eisini almennu stovnarnir.

Tað má bert harma ein, at teir flokkar sum eiga høvuðsábyrgdini av tí fíggjarpolitikki og ruðuleika, sum hitt føroyska samfelagið er í, Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Kristiligi fólkaflokkurin ikki vilja verða við í hesum bjargingararbeiði, men í staðin nýta hesa ringu støðu Føroyinga til egnan plitiskan vinning og atkvøðufiskiskap.

Harra formaður, fyrsta fíggjarlógaruppskotið frá hesu samgonu er komið á tingbord, og tað sum ein serliga býtur merki í er, at ávísar skerjingar eru á nógvum ymiskum málsøkjum í mun til inniverandi fíggjarár, og takið eg í prinsippinum undir við hesum tiltøkum.

Ein eigur at gera sær greitt, at tá niðurskurður er á fíggjarlógini, so kemur hetta eisini at merkjast á teimum ymisku tænastuøkjum kring landið og eisini í eins egna valdømi. Millum annað havi eg bitið merki í at leiðslan fyri sjúkrahúsverkið mælir til at niðurleggja sjúkraflutningstænastuna, sum er sett á stovn í Eysturoy. Tá ein sum eysturoyingur sær slíkt tilmæli so er ikki løgi ein kennur harm og hevur hug at mótmæla. Men aftaná at hava spurgt meg fyri í landsstýrinum havi eg fingið tað fatan at landsstýrið ikki ætlar at niðurleggja hesa tænastu, men arbeiðir við at finna eina skipan fyri minni kostnað enn tann sum nú er í løtuni. Her meti eg at landstýrið er á rættari leið, tí møguleikar fyri at samskipa sjúkraflutningtænastuna við aðrar almennar stovnar í Eysturoy skuldi borið væl til og
kunna fingist fyri væl minni kostnað. Eg vóni at hettar fer at eydnast.

Harra formaður, undir hesum orðaskiftinum er nógv ymiskt komið fram, men tað verður ikki høvi til at taka øll punktini upp. Kortini vil eg tríva í okkurt sum formaðurin í sjálvstýrisflokkinum segði í fyrstu røðu síni m.a., at teir vóru samdur í at samfelag okkara var í

álvarligum búskaparligum trupulleikum. Eg halda tað hekk ikki rættuliga saman, tá formaður sjálstýrisfloksins í eini roynd at hjálpa uppá trupuleikarnar mælti til at avtaka bundnu uppsparingina, lækka tollin, lækka skattin so skattgjaldarin átti 75 oyru av hvørjari innvunnari krónu. Forvitnisligt hevði tí verið at vita frá sjálvstýrisflokkinum hvaðani tær 100 tals mió., sum samfelagið í hesu løtu hevur brúk fyri skulu koma frá, tá vit skulu lækka skatt og toll samstundist sum teir ætla at alt alment virksemi skal ótólmað halda fram.

Harra formaður, samgongan er farin undir eitt sera stórt og trupult arbeiðið og vil eg ynskja henni hepna hond scleiðis at teir ætlanir, sum lagdar eru í samgonguskjalinum koma at eydnast. Takk fyri

Torður Niclasen (kffff) eina viðmerkking

Harra formaður.

Til seinasta arað røðara. Hann endurtekur tað sum aðrir hava endurtikið í dag, har hann sigur at kristiligi fólkaflokkurin ikki vil verða við í bjargingartiltaki. Tað er misvísandi harra formaður, tí vit hava víst á, at vit fegnir vilja við, vit fegnir vilja gera sparingar á fíggjarlógini, men vit vilja ikki ganga við til at leggja størri byrðar á tey sum framman-undan hava nóg mikið at knossast við. Vit vilja ikki sum sambandsflokkurin verða við til sprongja 50% skatta-markið, vit vilja ikki verða til at lág og miðal inn-tøkurnar skulu fáa eykaskattarokning, og vit vildu ikki verða til at lógin um bundna uppsparing skuldi hava atturvirkandi kraft, vit høvdu okkara egna uppskot í hesum sambandi, sum gav landskassanum ávísar inntøkur.

Harra formaður, so fari eg at loyva mær eisini at endurgeva nakað sum ein sambandsmaður hevur sagt fyrr. við formansins loyvi: Hann sigur vit eru vitandi um at kreppa er í samfelgnum, eru eisini samd um tær flestu sparingar, men tá partar av inntøkupolitikkinum bein-leiðis stýrast ímóti okkara egna liberalisstisku stevnu-skrá, rakar tey veikastu meint, men slett ikki tekur

hædd fyri skattaspekulatiónum tá er ovboðið. Vit eru púra samdir við hesum sambandsmanni, ið skrivaði hetta í Dimmalætting 11. juli 1989, tað er hetta sum skilir okkum harra formaður

Lasse Klein (SJ) eina viðmerking

Harra formaður, tað skal bara verða ein heilt stutt viðmerking, til tað sum háttvirdi tingmaður Jákup Lambhauge nevndi. Hann var inni á hesum her, at sjalvstýrisflokkurin vildi leggja uppskot fram um at avtaka bundnu og tvungnu uppsparingina og eisini tolllógina soleiðis um hon bleiv samtykt, og tað er eisini púra rætt, og orsøkin til tað varð at tað var fultkomiliga óneyðugt at fara út til fólk eftir hesum pengum. Vit vístu á, at 1989 fíggjarlógaruppskotið er vaksið við 450 mió. kr. næstan eina ½ mia. í mun til 1988 fíggjarlógaruppskotið og tað er har at peningurin skuldi heintast og vit vístu á hvussu hesin peningur kundi heintast í tí uppskotinum sum vit høvdu tá í samband við hesu viðurskiftir, vit hava víst á, at tað er neyðugt, at skal man fáa gleði við at arbeiða so er neyðugt at fara undir eina viðgerð, vit tosaðu eina viðgerð, hvar í skattalættin sjálvsagt skuldi verða ein rættuliga tíðandi táttur í okkara skattalógarpolitikki, og har tosaði vit um at hvør einstakur skattaborgari skuldi hava 75 kr. eftir av hvørjari hundrað, og tað var væl ikki meira enn rímuligt, at loysti seg at arbeiða í hesum samfelag

Olaf Olsen (ff)

Harra formaður

Vit hava fingið eitt fíggjarlógaruppskot, sum er minnið enn tað sum var frammanundan, og tað man helst vera fyrstu ferð tað er hent, men tað er av góðum grundum. Eg rokni ikki við at nakar flokkur hvørki í andstøðu ella í samgongu, høvdu komið við einum uppskoti sum var dýrari enn tað síðsta hóast at nakrir og teir flestu úr andstøðuni siga at alt ov nógv og skeivt er

spart. Nakrir sig at niðurskurðir mugu ikki gerast, og aðrir siga at eykainntøkur mugu ikki áleggjast. Øll halda tað skilagott at spara, men bara ikki hjá sær, um soleiðis øllum skal verða gjørt til vildar so vildu vit haft eitt munandi dýrari uppskot. Um vit komu við einum slíkum so er eitt vist og tað er at pening høvdu vit ikki fingið til tað, hvørki við avgjøldum ella lántøkum, men er so nakað sum samgongan hevur ásannað, og tí er eitt uppskot, sum er nakað lægri enn tað undanfarna, og vit vóna at okkara samfelag kann koyra víðari nøkunlunda óskalað og klára vit at halda hesu rammu, so eri eg vísur í at tað fer at bera til. Tað er avgjørt eingin vanlukka at vit skera almennu útreiðslurnar niður við í meðal 8,3%. Eg veit at privatu og vinnuligu útreiðslurnar skulu munandi niður eisini, men tað kollsiglir okkara samfelag heldur ikki við. Tá íð spart verður, so er vandi fyri, at tað á summum avmarkaðum økjum kann nita ov hart, serliga har sum tey eru smá, og tað má tað helst ikki.

Tí hava teir ymisku stovnarnir tingið at vita um teir meta at ávísir partur innan teirra øki er játtað ov lítið, so veður avgjørt sæð við vælvild á teir spara meir á øðrum staðið, sum tað kanska ikki nýtir so fast fyri at hjálpa uppá har sum tað kanska merkist meinarí.

Í heilsumálum er hettar eisini galdandi, sum annars hevur fingið ein meðal niðurskurð, sum er millum 11 og 12% sum er nógv, men tó ikki so nógv sum fleiri onnur mál. Eg kann ugga Jógvan við Keldu við, at sparingarnar við sjúkrahúsverkið í Klaksvík, sum annars ikki er lutfaldsliga í stórum, er nøkur byrðjan til at leggja tann partin av heilsutænastuni niður og heldur ikki í Suðuroynni.

Tað er rætt at í viðmerkinginum hjá sjúkrahústjóranum stendur at ambulansatænastan í Eysturoynni skal leggjast niður. Har eru 8 mans um ein bil, og tað er ein sera dýr loysn.

Vit vita nú um vit kunnu finnað eina loysn, sum er munandi biligari og helst í hvussu so er næstan líka góð.

Annars má eg siga at stovnsleiðarar yvir høvur ikki eru av teirri hugsan, at tann sparing sum noyðist

at verða fyri at nerva virkseri munandi.

Tordur Nielsaen var her í áðni og tók nakað soleiðis til, at Signar hevur megnað at tað ikki verður spart á teimum økjum sum hann hevur umsitið. Nú veit eg ikki um at táð var soleiðis í Tordursa tið, sum landsstýrismaður og í samgongu, at hvør landsstýrismaður hvør sær skuldi royna at økja um játtanina á sínum málsøki sum møguligt, men í hesari samgonguni er ein semja gørd um tey ymisku málsøkini og so umsita vit tey í felag, og ikki royna at nýta mest møguligt hjá sær. Men eg rokni við at heilsuverkið fæst at virka væl við tí peningi sum er avsettur, hóast tað er minnið enn seinast.

Eg havi haft fleiri fundir við ymiskar partar av heilsuverkinum, og komi sjálvandi at hava fleiri, men aftaná hesar fundir, eri eg ikki vorðin samførdur um at heilsuverkið ikki kemur at tæna borgarinum væl, hvørturímóti.

Uppskotið til sparingar liggur ikki fast, og eg ivist ikki í at har koma broytingar at verða gjørdar. men Tordur veit sjálvandi líka so væl sum eg at tað altíð er tørvur á at bøta um eisini tað sum í løtuni ikki er, ikki peningur er til taks. Útbyggingin av sjúkrahúsverkinum, bygging av sjúkrahúsum kemur at halda fram, men tað er avmarkað hvussu nógv vit kunnu byggja fyri um árið.

Vit hava eitt vinnulív sum er illa fyri, so illa fyri, at tað má ikki hava verði so vánaligt yvir ein kamb nakran tíð síðani tað er vorðið so fjøltáttað, sum tað er nú. Fiskiskapur heima og burtur gongur ikki gott, fiskiídnaðurin hevði ser ringt ár í fjørð, annar ídnaður er um at geva upp andan og alivinnan hevur tað ikki stórt frægari.

Hetta er vánaligt grundarlag undir einum dýrum samfelag, vit mugu velja okkum nakað at stuðla, og vit hava valgt okkum fiskivinnuna hæði á sjógv og landi, tí hon er tað sum tíðir mest. Men vit mugu minnast til at at hvørja ferð, at hvørja ferð vit rinda pening aftur til fiskivinnuna, tá leggja vit eykabyrðar á restina av vinnulívinum, sum ikki verður stuðlaður, tað vil siga at gera møguleikarnar verri har. Hettar førir við sær at

vit ikki fáa nakað alternativ til fiskivinnuna við hetta lag, tí tað fær meir og meir slagsíðu.

Jm nú útreiðslustøðið økist skjótari enn inntøkurnar og tað hevur tað gjørt leingi, so skal meir og meir rindast aftur til fiskivinnuna og harvið óiva fíggjarlógin økjast ár um ár, so er úrslitið av hesum at størri og størri upphæddir skulu flytast rundt í okkara samfelag uttan at nakrar fær meir at ráða yvir. Bruttolønin økist, tó uttan at nakrar lønmóttakari fær størri keypiorku, men útreiðslukontiðin verður so stór at einki virksemi fæst at standa seg í kappingini við fyritøkur í útlandinum, og tað eigur at fáa okkum til at hugsa um hvat ið kann gerast og har skal nýhugsan til.

Tað var Jákup Lindenskov, sum spurgdi um Nordafar. Hvat við tí, og um tað fór í likvitatión ella ikki. Nordafar fer helst í likvitatión, men tað verður ikki innan fyri tær fyrstu 6 vikurnar í hvussu so er, men tá kann tað hedna og tá kann tað henda og tað endar óiva við tíð. Hvat annars hendur við Nordafar tá, og um tað fer í likvitatión so liggur tað ikki stilt, og tað er ikki, also málið sum so liggur ikki stílt og bara sovnar burtur, men tað hevur verið gjørt ein planur ella ein útrokning av hvussu nógv skal til fyri at Nordafar støðin kann virkað aftur, tað er eitt tal sum liggur millum 15 og 24 mió, alt eftir um man ger tað í stand til at kunna nýtast til saltfiskframleiðslu ella saltfiska- flaka- og frystiframleiðslu. Síðani hava grønlendingar biðið um at fáa eina uppstilling yvir, hvussu ein rakstur kann verða fyri at bera eina slíka útreiðslu, og tað er eisini gjørt og sent grønlendingum og tað sýnir, at um støðin skal nýtast bert til saltfisk so skal man hava 8000 tons at arbeiða og um hon skal útbyggjast so hon kann taka ferskan fisk inn og arbeiða hann til flak og frystast, so skal man á eina 11000 tons.

Hetta er so tað sum grønlendingar verða kunnaðir um nú og so hoyra vit hvat teir hava at siga um tað ,um teir hava áhuga fyri at gera íløgur í hettar virkið saman við føroyingum. Eru teir tað, so verður málið tikið uppaftur til at takað endaliga støðu, og tá er

møguleiki fyri at tað kann verða føroysk virksemi har, helst bæði á landi og kanska eisini í fiskiskapinum, so vít koma at hoyra nakað skjótt um hvat hendir við Norðafar annars.

Aftur til búskapin. Um tað ikki fer at venda, so mugu vit til at leggja størri tollavgjøld á og tað fáa vit ikki gjørt um vit skulu gera avtalur við útlond t.d. við EF. Vit hava helst møguleikar fyri at fáa eina rættuliga góða handilsavtlau við EF, men teir vilja helst treyta sær at teir fáa somu sømdir frá okkum, sum vit frá teimum, hetta gerst ikki við teimum avgjøldum sum vit hava á vørum sum koma frá EF, sum eg segði her krevst ýhugsan, men fáa vit eina avtalu við lítlum og ongum tolli inn í EF, so letur tað upp fyri nógvum og serliga fiskavørum, sum vit ikki hava haft økonomiska møguleika fyri at hava framleitt áður, tí tá kunnu vit fáa avgjøld av, sum vit annars hava rættuliga stór í løtuni.

Sum eg nevndi frammanundan so rokna vit fiskin at verða tann ráðvøran, sum natúrliga er okkara tilfeingi at gera burturúr, tað er rætt, men tað er ikki vist at tann fiskur sum vit kunnu veiða sjálvir er nóg mikið til at gera burturúr, hettar hevur serliga vist seg at verða so í seinastuni.

Men nú er jú so at tey mest framkomnu londini hava ikki størst úrtøku burturúr tí sokallaðu primervinnuni, og hjá okkum svarar tað til fiskiskap, tað ber til hjá øðrum at keypa rávøru og tað ber helst til hjá okkum eisini. Vit eru í ferð við at kanna um tað ikki ber til at keypa frystan fisk og virka hann víðari í Føroyum. Um hetta er ein gongd leið, sum tað helst er, so er her ein møguleiki fyri at fáa nóg mikið av rávørðu til fiskavirkini aftur. Men vit hava í løtuni ein stóran trupuleika at dragast við og tað er gjaldførið og kanska umfígging eisini. Gjaldførið er nakað sum allir partar av samfelagnum hava ov lítið av í løtuni, bæði landskassið og bankar, skip og virkir og prívat persónar. Hetta er eitt mál sum má loysast, og tað má loysast skjótt, men hettar minkar so ikki um uttanlandsskuldinia í fyrstu syftu, men uttan gjaldføri fáa vit ikki

samfelagsnjólinum at mæla, og vit fáa ikki pening uttan-eftir, sum ikki er ov dýrur uttan at vit royna at yvirhalda eina fíggjarlóg, sum sýnir at vit hava tamarhald á okkara búskapi, so tað mugu vit gera okkum ónak fyri. Takk fyri.

Karin Kjølbro (tf) eina viðmerking

Harra formaður

Tað var seinasta ærðaða røðara. Nú er tað soleiðis at sjúkrahússtjórin er komin við einum uppskoti um sparing til landsstýrið, og hettar eru rættuligar stórar upphæddir og helst ein gloypibiti fyri eitt nvørt landsstýrið ið vil spara.

Tá eg havi tikið orðið, so er tað millum annað tí, at í hesum uppskoti verður mælt til at deild 4 á landssjúkrahsinum verður stongd, tað er tey sinnisbrekaðu og harumframt skal hesin økissálarlæknin gerðast yvirlækni á seingjaavsnittinum á psykiatriskarí deild.

Í fyrsta lagi er at siga, at tað tykist øgiliga tilvildarligt, tá vit í seinasta fíggjarári fingu ein økissálarlækna, sum skuldi verði nakað av tíð sum vit virkuliga høvdu tørv á, tí talið av sjúklingum er so stórt og vit hava ikki pláss fyri teimum á psykiatrisku deild so skal hann virka í markini um eg so má siga. Hetta virkar ikki álitisvekjandí fyri tey sum eru engagerað í hasum problematikkinum. Harnæst at man skal stongja eina deild 4, tí tað er vitturligt fólk á psykiatriskari deild, sum ikki pláss er fyri nakra aðra staðir, tað eru nógvir ymiskir bólkar, eg hugsi eina mest um vaksnar menn millum 20, 25 og 50 ár, sum eru sinnissjúkir, sum kanska drekka brennivín, sum kanska eru eitt sindur kriminellir eisini og sum eingin rættuliga hevur pláss fyri. Hetta seingjapláss kostar metri enn 300 túsund um árið, at hava tetr búgvandi har, um so vit nú stongja eisini og samstundis ikki eisini skapa aðrar útvegir, so dugi eg als ikki at síggja, hvussu hettar her skal rigga og heldur ikki at skapa møguleikar fyri, at økissálarlæknin virkar í markini. So hattar

fari eg at biðja landsstýrið um, at verða sera varin við. Í øðrum lagi hettar, tað er dýrt at verða fátækur. Í trý ár hevur cygnalæknin søkt um at fáa eitt tól til laserstrálir, mær kunnugt senda vit millum 30 og 40, fólk á Rikishospitalið til viðgerð av tí slagnum, summi skulu eyðvitað hava onkran við sær. Hettar tólið kostar 300.000 kr. Senda vit eitt fólk av stað fyri 5.000 kr. hvørja ferð plus tað, tað kostar, vit brúka jú ikki Ríkishospitalið longur ókeypis, so hava vit skjótt brúkt tað. tað kostar at keypa eitt slíkt tól, tí er tað hettar, tað er egiliga dýrt at vera fátøkur, men vit mugu royna at hugsa eitt litið sindur víðari, og hvat er rentabult. Takk fyri.

Tordur Niclasen (kfff.) viðmerking

Harra formaður

Tað var ein viðmerking til æraða landsstýrismann Olaf Olsen í sambond við heilsumál.

Jú, harra landsstýrismaður, tá eg sigi, tað hevur eydnast Signari Hansen, landsstýrismanni at halda skansan viðv. sparingum á §§ 14 og 15, so sigi eg tað út frá konkretum tølum, sum fyriliggja. Um vit gera samanlikningar við teir sparingar, sum fara fram serliga á heilsuøkinum í mun til §§ 14 og 15, so kunnu vit ikki koma til aðra niðurstøðu, tí rakstrarsparingar á §§ 14 og 15 eru so at siga ongar, og tað nýtist eg ikki at siga Olaf Olsen, um hann hyggur eftir og telur saman, so kemur hann til sama úrslit.

Eg haldi ikki, eg fekk serliga nógv svarð uppá, hvørjar ætlanir, ið landstýrið hevði, men tó eitt var at leggja til merkist, og tað var, at landsstýrismaður upplýsti, at hesar sparingar ikki vóru fastlagdar, vil tað so siga at tær 207 mió.kr., sum eru avsettar til raksturin av landssjúkrahúsinum, at tær kanska, tá ið avtornar, fyri 1990 kunnu strekkja seg upp á einar kanska 220-230 mió.kr. Tað er bara tað, sum eg vil spyrja, nú ristir løgmaður
á høvdið - nú eru teir ósamdir báðir skilji eg, tað kanska eg fái greiði á. Tí hesar sparingar sum her er

talan um eru gjørdar á ein slíkan hátt at tær eru óforsvarligar, tær koma at lukka psykiatriisku deildirnar, tær koma at minka munandi um møguleikarnar fyri kvalifiseraðum fólki innan fyri heilsuverkið, og tær koma steðga tí spariætlan sum lá í økissálarlæknanum o.s.v. Hin vegin er tað at tegnast um at landsstýrið álítkavæl, sjálvt um tað framgongur av viðmerkingunum frá sjúkrahússtjóranum ikki hevur ætlanir um nú at niðurleggja ambulansatænastuna í eysturoynni. Grundin til at vil settu hana á stovn har, nettup har sum hon var, var tí hon var rættast plasera geografiskt og tí vit vildu hava fulla trygd 24 tímar um døgnið. Eg ivist í um landsstýrið kann gera tað bíligari, væl at merkja um teir skulu varveita trygdina. So til seinast hvat hevði landsstýrismaðurin at siga viðv. at teir ætla at innføra gjald fyri laboratorið og røntgentænastur, hvat verður tað næsta, verður tað at teir innføra gjald fyri at skal innleggjast til medesinska viðgerð ella til skurðviðgerð á landssjúkrahúsinum, hetta er tað sum vit høgrakreftirnar aðrstaðir ganga inn fyri.

<u>Eergeir Nielsen</u> (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Tað er ein viðmerking ella kanska ein fyrispurningur viðv. tí tosinum sum er um ambulansatænastu. Vit sóðu at Lítlating tok hol á viðgerðina av fíggjarlóginí og løgmansrøðuni fyri einari tíð sínari, og tá var ein ræðumyndunum hjá javnaðarflokkinum málað upp beinanvegin av Atla Dam og hon var hon at ambulansatænastan við Suðuroyar sjúkrahús fór at steðga. Eg hugsaði við mær sjálvum, tað at eitt sjúkrahús ikki hevur eina mobila tænastu, eina tænastu sum kann flyta sjúklingar sum kann flyta sjúklingar inn og út úr húsinum, tað sjúkrahúsið kundi væl sakstans eins væl lagt stilt. Men so fór eg at hyggja fylgiskjølíni til løgmansrøðuna og har stendur sannliganí frá umsitingini við sjúkrahúsið har suðuri, at um so er at teir skulu spara hesar pengarnar so verður neyðugt at steðga ambulansunum.

Fyrí tað fyrsta haldi eg at tann sum stovnar tílíkt, tann hevur ikki skilt demensiónirnar í einum sjúkrahúsverki, og tá nú landsstýrismaðurin kann upplýsa okkum um at ambulansatænastan í Eysturoynni kemur at halda fram, so kundi eg gott hugsa mær at vita um tað sama verður galdandi har suðuri, ikki tí eg rokni við at svarði eg ja, sjálvandi. Takk fyri

Olaf Olsen (tf)

Harra formaður.

Tað er soleiðis at tá skal sparast, so skal tað burturúr onkustaðni. Sum eg nevndi í mínari røðu so ber altíð væl til at spara hjá øðrum, men vit skulu spara øll somul og eisini á sjúkrahúsverkinum, men sum eg eisini segði, tað skal takast so lítið mcínt sum møguligt.

Karin Kjølbro spurgdi um deild 4 og økislæknan, eg havi so seint sum í dag haft fundir aftur um hettar m.a. og annað sum eisini hevur verið nevnd her. Um tað er ein bíligari loysn við at gera sum tað koyrir nú so vil tað ikki verða gjørt, og tað sigur Karin Kjølbro og tað sigur onkur annar eisini, so tað verður tikið uppaftur. Tað er dýrt at verða fátækur, við hvørt er tað rætt at nýta pengar skjótt um man hevur ráð til tað, vit hava avmarkað ráð til tað, men vit koma at útbyggja sum eg nevndi við tólum og øðrum, men vit noyðast at prioteritera soleiðis at vit fáa ikki alt uppá ein gang, og hvat er mest neyðugt tað velst um hvør ið sigur tað.

Tordur Niclasen nevndi tað um tað nú varð soleiðis at tað ikki var fastlagt at spara niður til 207 mió.kr. fyri sjúkrahúsini, tað er tað, tað er ikki sparitiltøkini sum hvør í sær neyðvendigvís skulu verða soleiðis, men vit skulu gera okkum stóran ómak fyri at halda tað. Og aftaná teir fundir sum eg havi haft bæði við sjúkrahúsið, sjúkrahúsverkið og sjúkrahússtjóran og aðrar innstansir, so føli eg ein góðan vilja til at man vil royna at halda hetta bugetti, og at tað ikki skal ganga, eg vil siga nevniverdugt yvir tey sum skulu nýta hesa tænastu, men eitt er givið, at cingin kann fara at

lova eina betri tænastu við at skera niður, tá skal tað hava verið sera skilaleyst
disponerað framanundan. Síðan var tað ambulancatænastan, hon liggur kanska geografiskt væl placera+ í Eysturoynni, men um vit rokna fólkatalið við og so royna at rokna upp á tað, so er Skálabotnur ikki absolut tað røttasta staðið. Tað kann verða aðrar staðir, og tað er tað, sum verður hugsa um nú, at gera nakað við tað og vita, um tað ikki kann rekast bíligari enn, tað hevur verið, íð hvussu so er fram í móti tí sama tænastuni, sum tað hevur verið.

Hergeir Nielsen spurdi um, hvussu tað var í Suðuroynni og tað er tað sama sum verður hugsað um í Suðuroynni, tað er um man ikki kann leggja nakrar tænastur saman soleiðis, at man kann rationalisera. Hetta er sum sagt tað, sum tað verður arbeitt við, men tílsamans ætla vit at gera nógv fyri at halda okkum innanfyri tær 207 mió.kr., sum eru avsettar. Takk.

Lasse Klein (sf.)

Harra formaður.

Høgra kreftirnar gera sum kunnugt bart, høgrakreftirnar krevja nú gjøld inn frá fólki. Tað er tað, sun er komið fram undir hesi viðgerðini, at nú skulu ferðafólk gjalda plus 5 kr., bilar plus 10 kr., og nú er man í ferð við at krevja brúkaragjøld til sjúk, ja, tað næsta verður tíl operatiónir, og at tú skal gjalda brúkaragjald, tá ið tú fert í skúla fyrstu ferð sum 6 ára gamal, tú skal gjalda gjøld í samband við barnalækna og tannlækna o.s.fr. Vit mugu, íð hvussu so er, staðfesta, at høgrakreftirnar hava, íð hvussu so er góðar dagar í hesum døgum.

Hvussu er so munurin í millum Sjálvstýrisflokkin og hinar flokkarnar. So má man spyrja seg sjálvan, ja, men hvat er fólkaflokspolitikkur, hvat er sambandspolitikkur, hvat er javnaðarpolitikkur? Har er neyðugt at brúka eina mynd. Vit kunnu fyristilla okkum, eina tilvildarliga fyritøku í Havn, vit kunnu nevna eina og hvørja t.d. Auto í Havn.

Fólkaflokspolitikkur er, at tað er Jógvan Sundstein sum eigur støðina. Sambandspolitikkur er, at Pauli Ellefsen eigur bilarnar og hinvegin, sosialistiskur politikkur, er, at Javnaðarflokkurin og har við Atli Dam eigur bæði støð og bilar og koma vit síðani til sjálvstýrispolitikk. Sjálvstýrispolitikkur har aftur í móti, hann byggir á miðflokkahugsjónina, har hin einstaki eigur sítt egna vinnutól og tekur fulla ábyrgd av tí, og tað er hesin stóri munurin í millum føroysku flokkarnar á Føroya løgtingi í dag.

Vit hava ikki hoyrt nógv um fiskivirkuna og tað kanska av góðum grundum, tí at vit skulu ikki vænta undirverk yvirhøvur. Eg havi hug at nevna, og eg havi eisini nevnt tað fyrr, at t.d. kundi eg hugsa mær til, at trolararnir á tí djúpa vatninum, sum í dag fáa 7 mió.kr. hvør árliga frá tí almenna ella 80% av teirra inntøkugrundarlagi og fyri at raksturín skal koma niður á 0 skulu teir hava 3 mió.kr. aftrat teimum 7 mió.kr, tað vil siga, at 10 mió.kr. skal hvørt av hesum skipum fáa, eini 130 mió.kr. árliga frá tí almenna. Eg vil bara spyrja, skal henda støðan halda fram, so kundu hesi skip eins væl liðgi við bryggju í Havn við slanguni út í Tinganes ella niðan á gjaldstovuna.

Hvussu ofta hava vit spurt, hvørjar broytingar ynskja tit í hesum mynstrinum og trúgva tit, at tað er slíkar upphæddir, sum Palleba vil gjalda til. Vit eftirlýsa ein fiskivinnupolitikk.

Nú ætlaði eg at koma eitt síndur inn á heilsumálini. Sum kunnugt er komið fram undir hesi viðgerðini, at Pauli Ellefsen vil halda fasta uppá, at tað skal verða hetta fíggjarlógaruppskotið, sum er galdandi, tað sama segði framsøgumaður fólkafloksins Anfinn Kallsberg, men nú er Olaf líka sum byrjaður at rilla eitt síndur á, kanska vit sleppa at varðveita ambulancu tænastuna, hvør veit. Treytin fyri upphæddini, sum stendur á fíggjarlógini, hasi upphæddini upp á 354 mió.kr., er tann, at nøkur ávís konkret viðurskifti verða fylgd og har í millum annað, at brúkaragjøld verða ásett, at tað verður dýrari at verða sjúkur, deild 4 skal niðurleggjast, ambulancatænastan í Eysturoynni skal niðurleggjast

o.s.fr., og at hesir 8 portørarnir skulu tveitast fyri dyr. Halda er úrslitið, men bara higar til í ár og tað hevur Kongshavnar Kvinnufelag
eisini víst á í einum brævi til Føroya løgting, hevur verið nógv brúk fyri hesi ambulancatænastuni, men eg eri fyri sovítt samdur við Olaf í tí, at man kann kanska táa meira burtur úr tí við at placera støðina øðrvísi, enn hon er í dag kanska til eitt meir sentralt stað. Vit síggja eisini á heilsuøkinum, bæði í samband við Klaksvíkar sjúkrahús og í samband við Suðuroyar sjúkrahús, at har eru veldugа stórir niðurskurðir. Vit hava einki í móti sparingum, men hví kona tit ikki við einum uppskoti, hvar vit niðurleggja øll sjúkrahús í Føroyum, tað er ein veldug sparing í sjálvum sær, og tað er væl tað, sum tit eru í ferð við at gera í samband við hetta uppskotið, sum nú liggur á borðinum, ein tilvildarlig sparing.

Løgmaður viðmerking

Harra formaður.

Bin stutt viðmerking til seinasta æraða røðara.

Nú er tað soleiðis, at ein av teimum størstu krupulleikunum, vit hava í okkara samfelag er fiskivinnan, og tað er tað, sum vit arbeiða mest við, eisini úti í landsstýrinum, tí hon er já grundarlagið undir okkara samfelag, og vit hava, minnist meg rætt, 11 djúpvatnstrolarar, sum fiska nøkur í 20 ella 30.000 tons, sum verða landað til nøkur av flakavirkjunum hjá okkum.

Nú eftirlýsir Lasse Klein støðuna hjá landsstýrinum og sigur, hvat vilja tit gera við hesar djúpvatnstrolarar? Teir fiska, og teir fáa ein rættiliga stóran stuðul úr ráfiskagrunninum, tað vita vit, men landsstýrið hevur skyldu at arbeiða við hesum, og tað gera við. Vit arbeiða við nógvum ymsum tankum og uppskotum m.a. eisini um auktiónssystemið. Vit arbeiða eisini við tankanum um, at teir møuligа skulu landa uttanlands viðhvørt o.s.fr. Men, eg fari her at eftirlýsa hjá Lassa Klein og siga, hvørja loysn hevur Lasse Klein upp á djúpvatnstrolararnar, tá hann spyr hann, hvussu er tað upp á

stutt sigt? Also, hvat vilja tit gera í ár og næsta ár við djúpvatnstrolararnar. Eg fari at spyrja Lassa Klein, um hann ikki vilhjálpa okkum við hesum. Hevur hann eina so góða loysn upp á hetta, so vilja við fegin brúka hana.

Lasse Klein (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Nú er Jógvan Sundstein vitandi um, at Sjálvstýrisflokkurin hevur ferð aftan á ferð víst á nakrar loysnir í sambandi við hesar trupulleikar, sum serliga tey skipini hava, sum fiska á djúpum vatni, men ikki bara tey, eisini til fiskiflotan í síni heild. Vit hava fyrisligið eina sokallaða turnusskipan, og vit eru í ferð við at útbyggja hana upp aftur meira, og vit fara eisini at koma við einum heilt konkretum uppskoti, sum gongur út upp á, hvussu vit heilt grundleggjandi broyta hesi viðurskiftini, tí tað er neyðugt hjá Petur Reinert at broyta hesi viðurskiftini. Tí tað ber ikki til, at júst hesi sleppa at liva í súS og dúS upp á skattaborgarans rokning, tí tað, sum er komið fram, er, ja, hví selja tey ikki t.d. á týska marknaðinum og fáa millum 12 og 14 kr. pr. kilo og harvið hava møguleika at klára seg og harvið hava møguleika at spara Palleba fyri eini 140 mió.kr. árliga.

Løgmaður viðmerking

Harra formaður.

Eg takki Lassa Klein fyri svarið. Eg má siga, at eg gleði meg til tað ógvuliga grundleggjandi uppskotið, sum fer at koma frá Sjálvstýrisflokkinum um hetta málið, men eg skal samstundis gera vart við, at tað er manning við hesum bátunum, sum eisini skal vinna pengar, og tað eru fólk, sum arbeiða á flakavirkjunum, sum eisini skuldi havt arbeiði av tí fiski, ið skipini fiska, tað er hatta vit skulu hugsa um, men eg gleði meg til at síggja uppskotini.

Marita Petersen (jv.)

Harra formaður.

Eg fekk ikki tið at siga alt tað, sum eg ætlaði mær, og tað fái eg kanska heldur ikki hesuferð, tí sum eg segði, hetta er ov stutt tið, sum er sett av til at viðgera politikk í Føroyum. Eg haldi, at vit skuldu brúkt meir tið til tað. Nú verður nógv tosað um heilsumál, so eg skal gera nokk so stutt av og ikki taka so nógv fram, sum fólk hava verið í holt við, men eg kann bara konstatera, at tað er ein niðurskurður upp á umleið 12% og at loiðslan fyri sjúkrahúsverkið hevur gjørt eina fíggjarætlan sambært uppskot landsstýrisins um játtan og vil seta nakrar treytir við.

Onkrar av hesum treytunum eru góðar, og eg haldi at okkurt av tí er gott sum kundi verið broytt. Men annað, haldi eg, líkist ongum, og tað hevur verið viðgjørt oftt sindur her. Tað hevur verið m.a. tosað nokk so nógv um at lata oeildir aftur, og nú hava tinglimir í dag tingið eitt mótmæli viðvíkjandi hesum. Karin Kjølbro hevur eisini verið her og tosað um hetta og vísir á, at tað er ongastaðni hjá hesum fólkunum at fara.

Um vit so hyggja undir almannamál, kunnu vit siggja, at bústovnar til sinnisbrekað eru skornir niður í helvtina av tí, sum Sinnisbati hevur ynkst, so tað kundi gott verið ein spurningur, hvar hesi fólkini skulu fara. Um tað skal sparast og latast aftur med alla eilа helvtina av árinum, so verða sjálvandi eisini færri útreiðslur, og tað er kanska tann einasti mátin, tað veruliga ber til at spara á sjúkrahúsverkinum. Men harvið lækkar eisini tænastustøðið, tað verður longri bíðitíð, og møguliga kann henda bíðitíðin fáa álvarsligar fylgjur. So koma vit aftur til spurningin: Er hetta í samfelagshúsarhaldinum eln sparing? Kann tað ikki gerast dýrari, tá ið vit taka saman um? Fólk ganga longri sjúk, skulu møguliga longu hava almennan stuðul, skulu í longri tíð missa lønarútreiðslur og verða verri fyri, sjúkan verður verri av tí, at tað verður bíðað longur, og haraftrat kemur tað, sum eitur lívsvirðir. Tað at fólk skulu ganga bangin og bíða leingi, hava pínu og tílíkt.

tað kann oyðileggja lívið hjá sjúklinginum sjálvum og samstundis hjá teimum, sum tey liva saman við.

Tí, skulu vit ansa eftir, tá ið vit fara at spara á hesum økinum ikki at bakka soleiðis, at tænastustøðið verður ov lágt, men heldur royna at varðveita tað, sum er.

Viðvíkjandi sjúkrahúsbyggingini sigur løgmaður í løgmansrøðuni, at hon skal tálmast og útsetast. Nú er tað ikki hálvt annað ár síðan, at tað var viðtikið í tinginum, at byggja tey út eftir ávísum reglum, og lógin ásetti eisini,
hvussu nógvir pengar skuldu setast í grunnin til bygging. Her má, ið hvussu so er, broyting koma í, tí tað er ov lítið sett av á fíggjarlógini.

Tað, sum kundi verið áhugavert at vita, tá ið tað verður sagt frá tí landsstýrismanni, sum umsitir heilsumál, at tað skal roynast at haldast innan fyri tað økið, tað er, um vit fáa eina sparing á øllum trimum sjúkrahúsunum, so vit møguliga fáa 3 hálvvánalig sjúkrahús, alla skal tað verða soleiðis, at vit brúkar allar pengarnir á einum sjúkrahúsi og møguliga sum onkur hevur nevnt her, eru við til at leggja hini niður.

Tað eru gjørd nógv álit um sjúkrahúsverkið, men tað er synd at siga, at politikarar hava lurtað eftir hesum álitum. Nú hava fleiri fólk verið her uppi úr fleiri flokkum, kanska serliga úr samgongununi og vist á, at tey kanska ikki eru so nøgd við tann sjúkrahúspolitikk, sum verður førdur. Var tað so ikki rætt, at taka politiskt orðaskifti um allan henda spurningin soleiðis, at man kundi tikið øll aspektir við og har frá roynt at tikið eina avgerð og funnið fram til eina loysn har, sum vit virkiliga kundu fingið eina læknaliga og skilagóða loysn á sjúkrahúsverkinum. Har skulu vit so eisini hugsa um, at vit eru bara 47.000 fólk og vit búgva í einum oyggjasamfelag og búgva langt frá hvørjum øðrum.

Tað var eitt, sum eg saknaði undir sjúkrahúsøkinum, tað var sjúkrasystraskúlin. Onkur hevur spurt, hvussu við útbúgving av sjúkrasystrum? Eg haldi ikki, at tað eru 2 ár síðan, at tað var eitt øðiligt rok í tinginum um trotið á sjúkrasystrum. Verður tað trotið burtur

nú, tá allar deildirnar skulu latast aftur, ella hvat hendir?

Almannamál, hava fingið nøkulunda somu játtan og eg fái ikki tíð at viðgera allar kontoir, men kundi hugsað mær at tikið ta kontoina, sum eitur vanlig forsorg. Har er skotið upp at seta 20 mió.kr. minni av, enn stovnurin metir. Hyggja vit eftir, hvat almenn forsorg verður brúkt til, so verður hon brúkt til sjúku, barnsburð og barnaansingartørv, deyða hjá hjúnarfelag, hjúnaskilnað og arbeiðsloysi. Nú, tað verða vingar tíðir, er ein stórur møguleiki fyri, at trýstið á nevnliga hesa kontoina verður uppaftur størri. Eg haldi, at almannastovan ger tað nokk so greitt, hon sigur, at meginparturin av hesum útreiðslunum eru lógarbundnar, og hon kann ikki sjálv taka avgerð, hvønn vegin hon skal ganga, hon vil fegin hava politiskt signal um hetta. Kundu vit onnur ikki eisini fingið at vita um tey politisku signalini sum verða send yvir á almannastovuna, so vit vita, hvat borgararnir hava at halda seg til.

Í sambandi við dagstovnar eru settar 15 mió.kr. av í uppskotinum minni, enn tað sambært lóg skal brúkast til hetta økið. Tí kundi eg hugsa mær, at fingið at vita, hvørjar broytingar eru ætlaðar her. Skulu foreldur og kommunur gjalda meir, og stovnar latast aftur, ella skulu nýggir stovnar ikki latast upp og haraftrat, skulu vit minnast til, at tørvur á barnaansing gevur aftur eitt trýst á hina kontoina, sum eg nevndi tranmanundan. Í sambandi við hetta, kundi eisini verið nevnt málið um barnastyrk. Har er eitt mál á almannakontoini, sum er lækkað við 20 mió.kr., tað liggur ikki eitt orð í viðmerkingunum til tað málið. Also gott nokk stendur tað í løgmansrøðuni um tað, men kundi vit ikki fingið at vita, hvat tað er, tit ætla at gera, so fólk vita, hvat tað er, tí tey hava hugettera og lagt til rættis sítt húsarhald við hasum pengunum.

Tann kontoin, ið hevur fingið størst niðurskurð er grein 15. So kunnu fólk siga, at tað er ikki brúk fyri mentan, vísind og list, tá ið fólk ikki hava tak yvir høvdið, og tað kann verða nakað um tað, men tað er kanska nevnliga í ringum tíðum, at tað er brúk fyri, at

vit verja um tað, sum er okkara, at vit ansa eftir, at tað ikki fer fyri skjeyti, sum er okkara sereyðkenni.

Fróðskaparsetrið skal spara nógv og fróðskaparsetrið vísir á, at tað ber ikki til at ansa eftir tí samtykt, sum løgtingið hevur gjørt í 1986.

Bókasøvnini skulu spara og tað verður víst á, at tað sum hendir, er ikki í tráð við galdandi bókasavnslóg soleiðis samtykt í mei 1988.

Náttúrugripasavnið skal spara og vísir á, at tað er neyðugt at steðga ella niðurleggja arbeiði m.a. arbeiði við grindakanningum, sum løgmaður m.a. nevnir í løgmansrøðuni hjá sær, sum nakað týdningarmikið, sum teir vilja stuðla. Tað vil siga, at teir siga eitt í løgmansrøðuni, gera nakað annað á fíggjarlógini.

Viðvíkjandi bókaútgávu verður gjørt nógv burtur úr í løgmansrøðuni, men kortini er játtanin til barna og skúlabókaútgávur
lækkað við 800.000 kr.

Tíverri eru ikki stundir at viðgera øll tey málini, sum eg kundi hugsað mær at viðgjørt, men tað sær út, sum man hevur tosað nógv um, at tað er dýrt at umsita samfelagið, nú skal tað effektiviserast og rationaliserast, tað eru loysunarorðini. Hevði onkur í samgonguni kunna komið upp og sagt mær, hvat tey meina við, hvat er tað, og hvat vil tað siga?

Viðvíkjandi skrásetingareftirlitinum, so kunnu vit síggja tað, at játtanin er lækkað hóast tað, at nevndin fyri eftirlitið sigur, at tað verður torført at gera nakað skilagott arbeiði fyri at fáa skrásetingareftirlitið at virka, um upphæddin verður skerd. Also er so spurningurin, kundi tit so ikki spart alt burtur, eftirlitið er so trupult, so kunnu vit bara brúka hatta P-talið, sum vit vilja. Eitt gleddi meg, sum var sagt her í dag, og tað var Jóngerð Purkhús sum tosaði um ferðsluna. Eg síggi, at Ráðið fyri ferðslutrygd er lækkað, men har eru also vónir um, at tað kann gerast nakað kortini, og at landsstýrið møguliga ikki vil síggja so negativt upp á tað, og tað haldi eg er ógvuliga gott.

Tað eru tveir stovnar, ið okkara samfelag, sum

vit, ið hvussu so er, kundu brúkt eitt sindur av rationaliserings upp á. Teir hava ikki verið tiknir upp á tungina í hesum orðaskiftinum og tað er kanska ikki so undarligt, tí teir eru ógvuliga parantetiskir í fíggjarlógini og tað er sjónvarp og útvarp. Jú, lat nú rætt verða rætt, landsstýrismaðurin segði, at teir skuldu keypa hús til sjónvarp. Hví ikki, taka hesar báðar stovnarnar undir eitt, tað er rationalisering, hava ein stovn í staðin fyri tveir. Vit kunnu hava eina umsiting, hava eini hús, hava samskipað virksemi, betri avrik og standa saman móti tí ágangi, sum kemur uttanifrá. Tí, tað er heilt víst, at um vit skulu varðveita okkum sum tjóð í hesum samfelag, so er neyðugt, at vit taka stríðið upp í móti allari teirri ávirkan sum kemur yvir okkum samdøgnið runt, og tað kostar pengar.

Tað málið, sum er dýrt á fíggjarlógini næststørsta konto, haldi eg, tað er fiskivinnumál og serliga er tað minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna, men vit hava fingið skjøl til hesa fíggjarætlanina upp á einar 400 síður, haldi eg, sum nógv av tí er skrivað á báðum síðum, tað er ikki eitt orð skrivað um hesa konto, ikki eitt, eg veit ikki,
um tað er vanligt.

Løgmaður hevði eitt slíkt myndamál í dag. Hann tosaði um herða urtagarðin, sum tað vaks vilt í og sum tað var neyðugt at klippa niður úr og skera niður úr fyri, at tað skuldi vaksa uppaftur, men eg havi skilt, at tað, sum skal klippast og skerast, skal koyrast á kontoina, sum ikki eitt orð stendur um, hvussu skal verða brúkt.

Jógvan Olsen var eisini her uppi og tosaði so vakurt myndamál um at vaska ull og kara og slíkt. Eg er bangin fyri, at tað verður bara at kara grátt. Landið er í kreppu sum ongantíð fyrr, hetta siga Pauli Ellefsen og aðrir sambandsmenn, hetta siga Kergeir Nielsen, ja, teir báðir siga, at hetta er største fíggjarliga kreppa, sum vit nakrantíð hava verið í, fyri at sitera beinleiðis, meðan Jóngerð Purkhús er meir varin og hevur aðra hugsan, hon sigur, at tað er ov nógv gjørt av. Tað kann tí verða eitt sindur ringt hjá tí vanliga fólkinum at vita,

hvussu álvarsamt hetta er. Fin stórur partur av hesum orðaskifti hevur snúð seg um, hvør hevur skuldina og tað kann verða gott at fáa plasera ábyrgdina, men tað er kanska enn og meira týdningarmikið, hvat ið hevur skuldina, tí at tá ber til at brúka analysu av viðurskiftum til at bøta um í staðin fyri sum nú bara at bríkslast, at tú hevur gjørt tað og hin sigur aftur, nei tú gjørdi nakað annað.

Tað má komast víðari. Tað er ikki rætt mótvegis borgarinum' sum skulu gjalda hetta gildi, ikki at at fáa at vita, hvar fara nú hesir pengarnir, sum vit verða tikin fyri. Kom, sig okkum tað, konto fyri konto.

Vit kunnu síggja á fíggjarlógini, at tað verður skorið út hvørt einasta sindur á hinum játtanunum, men har verður einki, alt í ein dunga.

Nú er tíðin hjá mær farin, men eg byrjaði við at siga, at uppskotið til fíggjarlóg vildi vísa, hvør politikkur vildi verða førdur, og tað, sum vit skulu ansa eftir, tað er, at tað ikki verður ein miðsavnandi politikkur sum í nógvar mátar er ósolidariskur, men í staðin fyri at royna at fáa sum best burtur úr. Vit eiga at ansa eftir og kanska taka broddin av, at hesin politikkur kanska ikki verður alt ov harður í móti løntakaranum, barnafamiljum, kvinnum, pensionistum og øðrum veikum fólkum. Takk fyri.

<u>Karin Kjølbro</u> (tf.) viðmerking

Harra formaður,

Tað er púra rætt, at fólk eru ymisk av lyndi og tempramenti.

Eg havi mett støðuna soleiðis, at hetta er tann álvarsligasta kreppan, vit hava verið í, í eitt mannaminni. Eg meti tað út frá tí, at vit hava eina bruttouttanlandsskuld upp á 9 mia.kr. og inntøkugrundarlagið netto er stivilga 6. Inntøkugrundarlagið hjá okkum, sum vit sjálvi framleiða, er ikki meir enn 2.500 mió.kr., og tá so har umframt tað er hent, at eksportvirðið hjá okkum als ikki er hækkað í hesi mongu árini og fiskigrunnarnir eru niðurfiskaðir, so kann eg við mínum

tempramenti ógvuliga ilt at síggja, at tað skal verða so ljósareytt og lætt at bíta um seg við pengum og hvørt av sínum. Mær tykir, at tað er lættari at síggja álvarsemi í eyguni og royna at bøta um tað, heldur enn bara at dansa víðari, sum vit jú hava sæð, at politikarar hava gjørt í 80unum, tað var bæði hin samgongan og henda og tí haldi eg, at vit standa okkum við, at síggja hetta álvarsemið og handla eftir tí.

Tordur Niclasen (kfff.) viðmerking

Harra formaður.

Til seinasta ræðara eri eg at siga, at eg í høvuðsheitum eri sera samdur við hennara sjónarmiðum, hvat avleiðingar av hesum sparingum og hvat annars landsstýrisins tiltøk vilja føra við, ikki minst á heilsuøkinum.

Tá ein kemur inn á spurningin viðvíkjandi tørvi á starvsfólki, so skal upplýsast, at hóast landsstýrismaðurin í heilsumálum her hevur upplýst, at hann hevur havt fundir við ymsar instansir, so skal upplýsast, at eitt mótmælisskriv eisini haðani er á veg, sum vísir, at tørvurin í dag bara á sjúkrasystrum innan fyri heilsuverki er yvir 70. Hetta undirstrikar, at hetta ætlaða tiltak landsstýrisins er í ferð við at taka støðið undan okkara sjúkrahúsverki, undan okkara heilsuverki.

Hvat kreppuni viðvíkjur, harra formaður, er at siga, at kreppa er í samfelagnum, tað ásanna vit viðv. fiskivinnuni,
men við tiltøkunum, sum landsstýrið nú hevur sett í verk og við hesum spariætlanum, sum koma at raka skeivar herðar, ganga vit í móti eini kreppu, sum hetta land ikki hevur kent til.

Annars eri eg ikki samdur við undanfarna ræðara í tí, at teir størstu niðurskurðirnir á fíggjarlógini eru gjørdir á mentaøkinum, tað eru teir als ikki, um hon hyggir eftir, so sær hon, at á rakstrinum, hvat grein 15 viðvíkur, eru knappar 5 mió.kr. skornar niður og tað kann gerast í nógv størri mun, restin er niðurskurður á grunnum.

So var tað Fróðskaparsetrið, har eru 2 mió.kr. skornar niður, men tá royndi Jógvan Durhuus, landsstýrismaður at rættvisgera henda niðurskurðin við, at hetta var gjørt í nærum samstarvi við leiðsluna á fróðskaparsetrinum, so tað vil siga, at tað var alt í lagi, og at tað hevði ongar avleiðingar við sær, tað er ikki har á mentaøkinum grein 14 og 15. Burtursæð frá fólkaskúlanum kunnu munandi betri sparingar gerast væl at merkja, um so hækkar á eitt nú grein 12 .

Marita Petersen (jv.) viðmerking

Ja, tað var Karin Kjølbro, sum var her uppi. Eg veit ikki, um hon hevur miskilt, tað, at eg skjeyt støðuna upp í glens. Eg bara vísti á, at tað vóru so ymiskar meiningar eisini innan fyri hennara egna flokk, og at hon meinti, at tað skuldi síggjast upp á tað í álvarsemi og ikki siáast upp í glens. So má eg spyrja, nú er tíverri Jóngerð Purkhús ikki her, sær hon ikki upp á støðuna í álvarsemi, hevur hon ikki skil fyri støðuni? Eg havi hildið hana havt nógv skil fyri henni, og tí er tað, at tá ið man situr uttanfyri, tá vanlig fólk hoyra tað, so siga tey, ja, men hvussu er tað vorðið, tey og tey siga, at tað er so og so ringt, men hini siga, at tað er ikki so galið. Also, tað er ikki at vísa virðing fyri veljarunum, at tit gera tað. Hitt er, hvat gera vit í ringum tíðum? Tordur Niclasen nevndi tað, og segði, at vit gjørdu støðuna enn og verri. Eitt ógvuliga týdningarmikið í ringum tíðum er at byggja upp og styrkja tað, sum vit hava og tey sum hava tað, eru menniskjuni í samfelagnum, tað er at geva teimum góðar møguleikar, at gera skúlarnar góðar, útbúgvingarmøguleikarnar góðar, tað er tað sum vit skulu koma upp
aftur við at stuðla alternativum vinnuvegum samstundis, sum vit sjálvsagt royna at gera og fáa skil á tí, sum hevur hevur verið orsøk til kreppuna. Tað er ikki at forsterka tað, sum er, og eg vil siga tað, at henda samgongan, síðani hon er farin at virka, hevur víst ógvuliga vánaligt fíggjarligt hegni, og tað er heilt ótrúligt við so nógvum figgjarkønum fólkum, at tað skal

vera sovorðið. Eg haldi, vit skulda gjørt okkurt við tað.

Petur Reinert (tf)

Takk harra formaður.

Tað eru næstan 5 ár síðani, eg stóð á hesum her røðarapalli seinast og eg havi spurt meg sjálvan nú síð ani í gjár, tá ið eg kom attur inn á ting, er nakað broytt her, ella er støðan tann sama? Er orðalagið tað sama, ella er nakað vorðið øðrvísi? Eg má siga, at nakað er líkt sær sjálvum. Her er ein samgonga og her er ein andstøða, og eg hevði trúð tí, at menn vóru farnir frá tí, at skylda upp á hvønn annan, hvør ið átti stóran ella, hvør ið átti lítlan lut í tí skili, sum valdar í dag.

At skilið ikki er gott, tað vita vit øll, og at nakar er skuldaleysur í hesum her, tað fari eg at ivast í. Hvør ið eigur størstu skuldina ella minstu skuldina, tað kunnu vit so fara at kjakast um, men eg haldi tað er fávitskut og førir ikki til nakað sum helst.

Tað, sum førir til nakað, tað er at konstatera, at skilið ikki er gott, at tað er ein kreppa í hesum landinum, sum treingir til at loysast.

Líka síðani valið í november mánaða havi eg ynskt, at allir ábyrgdarflokkar, allir teir stóru flokkarnir, ið hvussu so er, tóku sær ábyrgdina av tí, sum farið er fram og søgdu, vit vilja verða við til at loysa hetta her.

Eg havi verið við í nøkrum av teimum samráðingum, sum verið hava, ið hvussu so er teimum fyrru, og har vísti seg, at tað var ein flokkur, sum vildi standa uttanfyri, og sum ikki vildi taka ábyrgdina og heldur vildi hóreiggja sær í eini andstøðu.

Vit hava hoyrt oddamenninar hjá hesum flokki her í hesum døgum, og eg haldi ikki tað, at tað er nakað konstruktivt, sum er komið haðani. Haraftur í móti tveitingar eftir Tjóðveldisflokkinum um, at hann er vorðin anationalur, og Javnaðarflokkurin nú er vorðið tað stóra dýrið í øllum tjóðskaparbardaga í Føroyum, so verði, so

verði, tað vóna vit.

Tjóðveldisflokkurin hevur ikki lagt tjóðskaparmál til viks fyri tað, um hann er farin upp í eina samgongu við Sambandsflokkin. Tjóðveldisfloksins støða og stevnumið eru fullkomiliga óbroytt. Eg rokni ikki við tí heldur, at Sambandsflokkurin er farin at hugsa um loysing fyri tað, um hann er farin upp í samgongu við Tjóðveldisflokkin. Líka lítið rokni eg við tí, at Fólkaflokkurin hevur slept sini støðu og hevur skift ham í teimum sosialu málunum, sum vit eru púra ósamdir við honum í principielt líka lítið, sum vit hava slept teimum tankum, sum vit halda, at eitt frítt og frælst Føroyar skal byggja á sosiala økinum, um vit eru farnir í samgongu við henda flokk.

Tað er annað, sum leikar á, tað er annað, sum ger seg galdandi, sum hevur gjørt tað, at Tjóðveldisflokkurin hevur tikið hetta rættiliga ótraditionella stigið at fara í samgongu við hesar flokkar, og tað er, at vit rokna við tí, at í einari stórari og sterkari samgongu hevði farið at borið til at loyst nøkur av teimum vandamálum, sum eru uppi í tíðini. Tað var okkara vón, at Javnaðarflokkurin eisini vildi havt verið við, men setti hann seg sjálvan tíverri uttanfyri.

Tá ið hetta fyrst og fremst er konstaterað, so hevði eg viljað kunnað farið at gjøgnumgingið fíggjarlógina, men tíverri havi eg ikki havt umstøður til at seta meg inn í hana. Har aftur í móti havi eg fingið stundir til at lesa løgmansrøðuna, serliga um tað, sum eg haldi meg hava best skil á, og sum eg havi mestan áhuga fyri, og tað er tað grundarstøðið, sum okkara samfelag skal byggja á og tað grundarstøðið, sum okkara búskapur skal byggja á, nevniliga okkara fiskivinnu.

Vit vita allir, at okkara fiskivinna er í stórari kreppu, vit vita tað, at tað er konstaterað, at á sjónum gongur næstan einki skip sjálvt uttan við studningi. Vit vita tað, og tað er konstaterað eisini í løgmansrøðuni, at á landi gongur einki virki uttan við studningi. Og so má man siga við sær sjálvum, her er nakað galið. Nú má tað verða farið at riva fyri eygunum á politikarunum, so teir síggja, at her er nakað fundamentalt galið.

Tá ið okkara høvuðsvinna er soleiðis fyri, at ein maður, sum hevur stórt skil á henni, Olaf Olsen stendur her fyri løtu síðani og sigur, tað ber ikki til, at bliva við at bera aftur til hesa vinnu, um so er, at tann posi, sum vit bera aftur, lyngist ár fyri ár. Tí hvørjum skulu vit so taka henda pening frá til hesa afturbering? Eg má siga tær takk fyri Olaf Olsen, at tú komst við hasum orðum, so er man vísur í tí, at nú er man í samgongu við einum manni, sum tað er farið at riva fyri eygunum á, og at hann høgt og týðuliga hevur kunngjørt, at hetta ber ikki til longur. Vit eru púra samdir í tí, tað ber ikki til longur.

Eg má siga tað, at líka sandur í summum, sum stendur í løgmansrøðuni, nú er tað tað, at her hevur verið so lítil andstøða, so tað ger einki kanska, um onkur úr samgonguni sigur okkurt kitiskt orð, so eri eg púra samdur í nógvum av tí, sum løgmaður ber fram.

Har sigur hann um fiskivinnumál, at fram yvir verður tó neyðugt at fáa ein fiskiflota, sum ber seg uttan munandi almennar afturberingar, vit mugu verða samdir. Til at fáa talið av fiskiførum niður á eitt støði soleiðis, at fiskastovnarnir kunnu koma fyri seg og fiskiførini fáa møguleika at royna, verður býtið og skipanin millum veiðihættir at leggja til rættis í góðari tíð, vit eru samdir.

Vit kunnu fyri so vítt eisini verða samdir við at blaða tvær síður longur fram, har, sum tað stendur, at flakavirkini høvdu eitt sera vánaligt úrslit í fjør, her má tað almenna hjálpa til, og so stendur nakað um at býta vørur millum o.s.fr.

Nakrir stórir nýggir tankar eru faktisk ikki í hesum her burtursæð frá einum tanka, sum kemur inn undir fiskavirkini, har sum tað verður sagt, at nú skulu fiskavirkini fáa tað, sum teimum tørvar. Men harra formaður, tað verður neyðugt í hesum sambandi at seta seg niður á afturpartin og hugsa seg ómetaliga væl um og minnist til tað, at vit í samgonguni, vit hava ikki so ógvuliga langa tíð til at gera hetta attur. Annars koma vit í dilemmirnar hjá Olafi Olsen nevniliga tað, at posin, sum skal berast aftur, verður upp aftur størri næsta

figgjarár og upp aftur størri annað figgjarár, uttan at nakað er hent og hvat so?

Í 1974 vóru vit í einari kreppu. Í 1975 kom eg í landsstýrið í januar mánaða. Flotin lá, hann fór ikki út, tað var eingki at fara eftir, man fekk ikki vinnuna við at fara út. Tað varð tá selt seg niður á afturpartin og roynt at koma við einum úrsliti um, hvussu hetta skuldi gerast. Hin nógv umrødda heildarloysnin kom undan kavi, varð viðtikin í løgtinginum og hevur fungerað fram til henda dag so ring, hon annars kann vera.

Eg skal ikki siga hetta her fyri at siga tað, at tað ikki verður arbeitt í hesum landsstýrinum, men eg vil leggja monnum dent á, at tá ið kreppan er so stór, sum hon er, so hjálpir ikki bara at konstatera, at kreppa er. Tað hjálpir heldur ikki at konstatera, hvar kreppan er, men tað, sum umrædur, er at siga, nú fara vit til arbeiðis soleiðis, at umstøðurnar fyri okkara høvuðsvinnu verða soleiðis, at man ikki nýtist at bera ein vaksandi posa artur til hesa neyðstøddu vinnu.

Fyri at kunna gera tað krevst eitt gott umhugsunnararbeiði, tað krevst eitt arbeiði í nevndum, tað krevst eitt arbeiði í landsstýrinum, og tað krevst eitt úrslit at koma burtur úr hesum arbeiði rættiliga skjótt, og tað úrslitið er tað, sum Føroya fólk bíðar eftir. Tí Føroya fólk er ikki bangið fyri at leggja pengarnar á borið, um tey síggja tað, at peningurin fer til eitt gagnligt endamál. Føroya fólk er eitt sindur í døpurhuga í dag, tað mugu løgtingsmenn vita. Runt umkring landið spyrja tey, hvat skal peningurin verða nýttur til? Men um peningurin verður nýttur til at fáa okkara lívsgrundarlag aftur á føtur, verður peningurin nýttur til at fáa okkara fiskivinnu aftur til hvíla í sjálvum sær soleiðis, at tað ikki er neyð og armóð umborð á hvørjum skipi, at tað ikki er neyð og armóð á hvørjum fiskavirki, so veit Føroya fólk, at peningurin er farin til eitt gott endamál, tí so kemur hann í dupultum máti aftur til tey sjálvi.

Tað er hetta, sum samgongan hevur sett sær sum setning at arbeiða við. Eg meti, hetta er ein góður setningur, men eg meti bara tað, at man skal fara til

verka, og tað, sum ræður um, er at fara til verka nú, so at Føroya fólk skilir, at tað er slíkt álvara í hesi samgonguni, at hon vil loysa ta kreppu, sum í hesum landinum er.

Er tað soleiðis, at nú kann tað gott verða, at okkurt er í hesum innkrevjingum, sum ikki er, sum tað eigur at verða, tað kann gott verða, at okkurt kundi verið øðrvísi. Eg eri ivaloysur í tí, at tað vil henda samgongan eisini taka henda kritikkin at sær og siga, vit vilja seta okkum niður at revidera hetta her. Møguliga er okkurt skeivt í hesum, møguliga vendir okkurt tann tunga endan niðureftir, og lat okkum fáa tað broytt skjótast gjørligt soleiðis, at tað ikki verður illgresið, sum veksur upp og køvir ta veltu, sum skal bera frukt um stutta tíð vónandi.

Tað hevur verið tosað nógv aftur og fram, eg skal yvirhøvur ikki fara at blanda meg upp í sjúkrahús, ambulansutænastur og tílíkt, og vil bara siga eitt, og tað er, at tað ber sjálvandi ikki til at steðga øllum privatum virksemi í hesum landi. Tað ber ikki til at skapa eitt kunstugt arbeiðsloysi. Tað ber t.d. ikki til at steðga slíkum atgerðum, sum eru neyðugar til dømis fyri at spara útlendskan valuta.

Tað ber ikki til at steðga einum bergholi millum Kollafjørð og Kaldbaksbotn og harvið lata fleiri milliónir av eykakrónum til innflutning av óneyðugari olju fyri at flyta alla ferðsluna til Havnar 400 metrar upp í luftina. Tað ber heldur ikki til at steðga hesum her og lata milliónir til óneyðuga kavarudding á fjøllunum. Tað er slíkt, sum man má seta seg niður og hugsa um, hvat ber til og hvat ber ikki til. Tað eru óivað nógv, sum man kundi hugsað seg fram til og nógv, sum man eigur at gera.

Eitt er vist og tað er, at vit í Tjóðveldisflokkinum eru farin til verka, og tit kunnu vera fullkomiliga vís í, at okkara verklutur ikki skal liggja eftir. Vit vilja gera okkara arbeiði í landsstýri, í tiskivinnunevnd, fíggjarnevnd o.s.fr. fyri at vinna á hesi kreppuni á skynsamiligan hátt skjótast gjørligt soleiðis, at tær byrðar, sum neyðugar verða at leggja á fólk, verða

soleiðis, at fólk orka at bera hesar byrðarnar, og at tær verða so rættvist lagdar sum gjørligt. Hetta skal her skal millum annað Tjóðveldisflokkurin verða trygd fyri í hesum landsstýrinum. Takk fyri harra formaður.

Niels Pauli Danielsen (kfff.)

Harra formaður.

Nú havi eg sitið her nakrar tímar, og orðið er so lutað til mín nú. Eg veit ikki, um tað hevur nakað endamál orsakað, at eg sigi tað, harra formaður, tá ið næstan eingin ja, ein landsstýrismaður er inni við hvørt og allar mest eingin, at standa her hjá okkum tingmonnum og seta spurningar til teirra. Men eg skal so royna tað í vón um, at onkur av samgongumonnunum, onkur av teimum er her, vil bera teimum heilsu og seta teimum teir spurningar, sum vit nú hava at seta teimum.

Harra formaður. Tað var áhugavert at hoyra tann síðsta talaran harra Petur Reinert, løgtingsmann, aftur her á tingsins røðarapalli, hann hevur cína góða rødd og dugur væl at tala, og tað er ein frøi fyri oyra at lurta eftir honum.

Vit kunnu bara vera samdir við hesum tingmanni tjóðveldisfloksins í, at tað er kreppa, og at tað er neyðugt at loysa hana. Tað er bara tað keðiliga við tí, at henda kreppa byrjaði um somu tíð, sum Petur Reinert varð landsstýrismaður í fiskivinnumálum 1975, og hon vardi øll tey árini, hann var landsstýrismaður, og er versnað, og nú er hon komin upp í hæddina. So harra formaður, vildi Petur Reinert verða við at loysa hesa kreppu, so eg haldi, at hann tekur upp eftir sær sjálvum, og tað er hann vælkomin til at gera.

Harra formaður. Hetta orðaskiftið um løgmansrøðuna á ólavsøku og fíggjarlógina er útsett í 14 dagar, tí at Tjóðveldisflokkurin hevði eitt aðalmál, sum hann vildi hava í gjøgnum áðrenn, so sum Dagblaðið skrivaði, at avrætta ein skúlastjóra. Áðrenn tað varð gjørt, so skuldi hetta orðaskiftið ikki fara í gongd. Tað er so hent nú og vit mugu bara ynskja Tjóðveldisflokkinum til lukku at tað cydnaðist, sjálvt um vit aðrir harmast og

eru ógvuliga keddir av tí, at ein flokkur sum Fólkaflokkurin so dyggiliga sveik í hesum máli.

Tað harmar meg nógv sum ein gamal tjóðveldismaður, at Tjóðveldisflokkurin er komin so langt niður, at hann er nøgdur bara við at táa ein stjóra skiftan út og ein skúla fluttan 200 metrar, at so skal hann verða tað, sum Pauli Ellefsen sigði her í gjárkvøldið, fittur at fáast við, lagaligur at fáast við. Hann gjørdi jú onga mót støðu, har var so semja og har var so gott at vera, hann skikkaði sær so ómetaliga væl, segði Pauli, og hann ivaðist ikki í, at hann fór at skikka sær væl, tað var stuttligt at vera í eini slíkari samgongu, sum Pauli Ellefsen sær til, elia fór Tjóðveldisflokkurin.

Eg haldi, tað er ógvuliga synd í tjóðveldisveljarum runt um í landinum, at hann skuldi enda, sum púra kvirrur og stillur, ja, og skuldi ikki siga, í sambandsleypinum.

Harra formaður. Eg fari fyrst at gera nakrar viðmerkingar til ólavsøkuræðu løgmans, og eg fari at leggja fyri við endanum, tí næstseinasta reglubroti, har løgmaður man hava mist seg burtur eina lítla løtu og fer at tala um at lækka skattin, hoyrdu tit? At lækka skattin í hesum tíðum, tá ið teir hava lagt uppskot fram um at hækka skattin, tað, sum teir kalla tað bundin uppsparing, men tað verður kravt inn sum skattur og er í grundini einki annað enn skattur.

Mær rennur til hugs valdyfti fólkafloksins og skránna hjá teimum forrestin um at útvega fólki mínni skatt. Sannliga teir søgdu eitt fyri veljarunum, men gera júst tað øvugta. Er hetta ikki at vanvirða fólk og halda tey fyri tað turra spott?

Løgmansrøðan talar eisini um búskaparstøðuna, hon sigur nógv um búskaparstøðuna um toll og skatt og bundna samansparing.

Løgmaður nevnir í røðu síni enn einaferð ta stóru uttanlandsskuld, sum var 6,7 mia.kr. í móti teimum 4,6 mia.kr., sum Tjóðveldisflokkurin, ið hevði fíggjarmál í hondum til seinasta løgtingsval, har hann fór til val saman við Javnaðarflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum upp á, at tað stóð væl til. Kassar vóru fullir, landskassin

var fullur, grunnar vóru fullir, tað fleyt yvir, og so næstan dagin aftan á í øllum førum mánaðin aftan á var so tómt sum ongantíð. Vit freistast at spyrja, hvar fóru hesir pengar, ið vóru í yviflóð áðrenn valið?

Vit vistu longu tá, vit aðrir, sum høvdu verið við eitt lítið sindur í landsins stýri tey undanfarnu ár, at hesi tøl vóru skeiv, sum vórðu søgd um uttanlandsskuldina áðrenn síðsta løgtingsval. At uttanlandsskuldin var størri, men vit kundi ikki siga, hvussu hógv størri. Eg vil siga tað soleiðis so hart, at eg meini, at Tjóðveldisflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin við vilja fjaldu nakrar upplýsingar fyri okkum, tað haldi eg meg hava grund til at siga, og tí komu hesi tølini ikki fram fyrr enn aftan á løgtingsvalið, men tá komu tey also fram rættiliga skjótt millum annað tí, at vit aðrir kravdu tey. Í fíggjarnevndini setti eg m.a. krav um, at øll hesi tølini komu fram, og at tey vórðu almannakunngjørd.

Hvør eigur so hesa uttanlandsskuld, hvør eigur hana? Tað er ikki landskassin, verður sagt, ella tað almenna, sum eigur so stóran part av tí, men tað er tað privata. Hvørjir eru so teir privatu? Jú, vinnulívið á sjógvi og landi, ikki tann maðurin, sum starvast í vinnulívinum, men teir, sum eiga vinnulívið, teir, sum eiga skipini, teir, sum eiga bygningarnar og virkini á landi, tað eru teir, sum eiga hesa uttanlandsskuld, verður sagt. Tað er also ikki pensionisturin, ikki barnið, ikki arbeiðsmaðurin, ikki fiskimaðurin ella annar løntakari á sjógvi og landi. Men hvør fær rokningina? Jú, rokningina fáa arbeiðsmaðurin, fiskimaðurin, løntakarin, barnið, pensionisturin, tey skulu gjalda. Tað skal skerast niður hjá teimum, sum løgmaður tók til í dag einaferð, at tað var fyri at skera niður, men tað skuldi skerast niður hjá teimum, sum ikki hava nakra skuld í hesi uttanlandsskuld o. ikki hava nakra skuld í nakrari kreppu, tey skulu líða undir tí fyrst og fremst.

Hesar inntøkulógir, sum vórður samtyktar í vár, taka frá tí minna manninum. Tað, sum er serliga skeivt við inntøkulógunum, er, at tær eru afturvirkandi. Tað er

eingin ner á løgtingi, sum hevur talað meira í móti lógum við afturvirkandi kraft enn okkara okkara háttvirdi løgmaður, men hann attraði seg ikki eina løtu við at seta hesa lóg í gildi um bundna samansparing, sum virkaði meira aftur eftir enn, hon virkaði fram eftir fyri 1989. Tí at tað var farið út um hálva árið, og hon tók alt tað hálva árið, sum var farið framman undan við upp í tað seinna, so langt virkaði hon attureftir.

Tað er rætt, at í lógini um bundna uppsparing til landskassan, hesir pengar, sum tú í fyrsta lagi fært, tá ið tú verður 65, stendur ongastaðni, at hon er afturvirkandi sum so beinleiðis í orðum. Tað stendur nakað heilt annað, hon er snildisliga orðað, tað stendur, at hon tær gildi dagin eftir, at hon er lýst. So spyrja fólk, ja men hvussu ber tað so til, so er hon ikki afturvirkandi, tá lð hon virkar dagin eftir, at hon er lýst? Jú, harra formaður, hon er afturvirkandi, tí at hon sigur, at tað er ein ársinntøka, sum skal rinda ta bundnu uppsparingina. Ein ársinntøka er fyri alt árið og ikki bara fyri nakrar mánaðir, og á tann hátt virkar hon aftur eftir soleiðis, at tú kemur at gjalda í juli tað sama, sum tú eisini skalt gjalda fyri januar dupult. Í august kemur tú eisini at gjalda dupult og í september eisini og allar mánaðirnar, sum eftir eru av hesum ári, kemur tú at gjalda dupult, tí at lógin er innbygd við afturvirkandi kraft, sjálvt um tað ongastaðni stendur.

Henda lógin rakar so meint sum fáar aðrar lógir nakrantíð hava rakt her á hesum landi. Tað søgdu vit teimum longu í vár, tá ið lógirnar vóru fyri, men teir vildu ikki lurta eftir, teir skundaðu hana ígjøgnum. Tá ið vit tóru til samgongumenn og kærdu okkara neyð, so søgdu teir, at teir høvdu ikki lisið hana, og teir tímdu heldur ikki at lesa hana, tí teir litu á tað arbeiðið, sum landsstýrið hevði gjørt.

Allir litu á Paula Ellefsen, sum er hondin, ið heldur í stýrisvølir hjá hesum landsstýrinum, og sum stýrir bæði tann sovandi tjóðveldisflokk og tann fólkaflokk, sum bara vil sleppa at varðveita løgmann og so er alt í lagi. Tað er Pauli Ellefsen, sum sigur, hvar skápið skal standa í hesi samgongu.

Eg skal seinni vísa tykkum á, at ikki alt tað, sum Pauli Ellefsen stóð her á hesum høga palli í gjár og segði um fylgjurnar av hesum inntøkulógum, er rætt. Hann segði nakað, sum var positivt skeivt. Tað skal eg koma aftur til seinni. Men áðrenn eg fari at vísa tað, skal eg vísa nakað annað, sum er við hesi lóg, og sum vit eisini ávaraðu ímóti, tá ið hon varð framløgd og samlykt, tað er, at hon spreingir 50% skattamarkið.

Tað eydnaðist okkum teimum smáu flokkunum í samgonguni 1985-88 at fáa Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin at halda seg frá at fara upp um hetta 50% skattamarkið, tað eydnaðist okkum. Tað er tí so meira syndarligt at konstatera, at teir borgarligu flokkarnir sum Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin attraðu seg ikki eina løtu í at spreingja hetta 50% markið og lata fólk koma at gjalda meira enn 50% í skatti. Tað er í stríð við teirra egnu stevnuskrá, men tað er líksaum lagt til síðis. Tað var var bara tað, tað galt um, at fáa hesar pengarnar inn, og so var líka mikið, hvør stevnuskrá hevði verið áðrenn valið, og hvat annað varð sagt áðrenn valið.

Soleiðis royndist harra formaður álitismenn. Tað er skeivt at spreingja 50% markið, tí tað má loysa seg at arbeiða, og tað ger ta ikki í dag, nú hesar lógirnar virka, tað loysir seg ikki at arbeiða. Tað er talað um kreppu, og tað er rætt, at vit hava ikki so góðar tíðir, sum hava verið, men hví ikki gera nakað annað? Hví ikki fara her og gera sum japanesarar og týskarar og aðrir, sum hava rikið ein borgarligan politikk, og sum pólendingar nú ætla at fara inn á eisini? Hví ikki gera sum teir og fara undir at framleiða seg burtur úr kreppuni? Tað er nógv fyri, at vit teir smáu flokkarnir skulu standa og síga Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum, at leiðin er at fara og framleiða seg burtur úr kreppuni heldur enn at fáa tey at halda uppat at virka, sum arbeiða í framleiðsluliðinum. Hví ikki fara inn og stuðla nesum? gera sum tað stendur í skránni hjá Kristiliga fólkaflokkinum, at lata persónliga skattin ikki fara upp um 35% av vanligari inntøku og í ongum førum upp um 50% og heldur økja um nýtsluskattin, so at tey,

sum brúka, koma at gjalda, og tey, sum lata vera við at brúka, sleppa frá at gjalda so nógv. Og sum tað stendur í skránni hjá okkum, at fara undir at skatta yvirtíð lagaligari, tá lá tað er fyri at halda vinnutólini gangandi og í mesta lagi av hálvari uppnædd.

Hví ikki fara undir at økja um okkara útflutningsvirði og siga t.d., at hetta er ein leið at ganga, tít eftirlýsa, at vit skulu lýsa nakað positivt og gott. Hetta er ein leið at ganga at fara undir at siga tað, at tey, sum arbeiða í fiskivinnuni á sjógvi og á landi, teir, sum manna skipini, tey, sum arbeiða á flakavirkjunum, at tey verða lagaligari skattað, at tey verða skattað minni enn onnur, tað er hart arbeiði.

Tað verður eyga hildið eftir teimum, sum arbeiða á flakavirkjunum, tey fáa ikki loyvi at hvíla eina einastu løtu, og tað sama er umborð á skipi. Hví ikki fara undir at siga við hesi fólkini fyri at fáa tey at framleiða og stimbra teirra hug at arbeiða, at tey verða lagaligari skattað, tá skuldu tit sæð, at okkara útflutningur fór at vaksa, og landskassin hevði eisini fingið nógv fleiri pengar inn. Tað hevði økt um framleiðsluhugin og innflutning landskassans.

Nú sigur formaðurin, at tíðin er úti, men eg havi biðið um orðið aftur seinni, og tá skal eg halda á fram Pauli Ellefsen (sb)

Harra formaður.

Tann spurningur sum kanska allarmest hevur sett sín dám á hettar orðaskifti, hevur verið tann bundna uppsparingin.

Í tí sambandi loyvi eg mær at siga, at tað er undir allan kritikk, at teir løgtingsmenn sum hava sett fram so ósakligar atfinningar ímótur reglunum um bundnu uppsparingina ikki kenna hesar reglur, sum jú hava verið viðgjørdar og samtyktar á løgtingi.

Teir kenna t.d. ikki reglurnar fyri pensionistar, eg haldi at sum teir hava tosað, so skuldi man trú at tað var nakað av tí allarfyrsta teir settu seg inn í, fyri pensionistar har er oglan soleiðis at tey sum meir enn 65 ár verða kravd í 1989, men í lógini stendur at

tey fáa peningin aftur tá íð tey eru 65, tó í fyrsta lagi 1 ár aftaná at lógin er samtykt, og hettar her eru tekniskar reglur, sum eru settar inn, tað vil siga tað at bundna uppsparingin í 1989 til fólk sum eru 65 ella eldri verður standandi 1 ár og so verður hon útgoldin. Fyri bundnu uppsparingina galdansi aftaná 1990, tá luttakað pensionistar á jøvnum føti við okkum onnur, tað vil siga at teir pensionistar sum í 1990 hava eina skattskyldugа inntøku uppá 110.000 kr. ella meira tey fáa eina bundna uppsparing. hon verður bundin í fýra á til fulla rentu og so fáa tey hana aftur tá íð fýra ár eru farin.

Uppsparingin fyri øll ikki bara fyri pensionistar, sum tað eina árið, men uppsparingin fyri 1989 fer inn í landskassan, sum eitt lán skattaborgarinum og renta við 5% og goldin inn í peningastovnarnar í 1992. So er tað uppsparingin frá 1990, hon fer ikki inn í landskassan, nú nevndi Niels Pauli Danielsen í áðni, ast hann kundi vísa á, at ikki alt tað sum Paull Ellefsen segði var púra rætt, og eg havi organtíð sæð so glaðan mann, sum fyri einum góðum tíma síðani úti í gongini her, tí hann kom og hann livdi allur sum hann var, hann segði, nú havi eg funnið út av endeliga at okkurt sum tú segði ikki var púra rætt og hann hevur eitt evarsliga lítið grann av sannleika í hesum her málinum. Tí eg segði fgjar sum ætlanin varð, tá vit gjørdu lógina at uppsparingin frá 1990 beinanvegin ferð inn á privata persónliga konti, og varð upplýst mær aftaná hettar orðaskifti, nevniliga tíðuliga í dag, at teir koma ikki at náa hettar her, at hon kemur ikki inn á eina persónliga konti, men tað sum Líkningarráðið ætla at fyrisláða landsstýrinum tað er tað at hon einferð um mánaðin, also fyrstu ferð 1. februar 1990 so verður ein upphædd sett inn á eina samalaða konti í hvørjum peningastovni, og tað verður gjørt í samband við avrokningarnar til kommurnar, sum allir tingmenn vita so verða kommurnar avroknaðar eina ferð um mánaðin, landsskassin krevur alt inn og so tá mánin er úti, so avroknar man til kommunurnar, so ætlar man at avroknað hesa bundnu uppsparingina inn á eina samlaða konti í hvørjum peningastovni og

hettar her er simpelthen ein tekniskur spurningur, tað tekur longri tíð, og tað er dýrari at gera tey programmir sum vit høvdu ætla at gjørt enn eln hevði roknað við.

Einasti munur frá tí sum eg segði í gjár, tað er tað at eg kann risikera, at min bundna uppsparing fyri 1990, hon kemur at standa á somu konti hjá bankunum sum bundna uppsparingin hjá Niels Pala Danielsen og Atla Dam og Hergeir Nielsen o.ø., Also tað vil siga tað, at tað er lítið sindur meira akollektivt enn tað sum vit ætlaðu frá byrjani av, men grundtankin nevniliga bundna uppsparingin fyri 1989 ferð inn í landskassan sum eitt lán og utgoldin í 1992 og at uppsparingin í 1990 og frameftir ikki ferð inn í landskassan, hon er sjálvandi óbroytt.

Annars kemur Líkningarráðið og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum roknl eg við at nærri at fastseta reglurnar um hesi her viðurskiftir. Nú er tíðin longu úti, og eg kann biðja um orðið einferð afturat, men eg hoyrdi at Signar Hansen, landsstýrismaður hevði fingið tað burturúr mínum fyrsta innleggi at komonikatiónin var so vánalig millum okkum í sambandsflokkinum og landsstýrismennirnar, soleiðis hevði hann fingi tað inn, at eg hevði fýlst á at og ikki hevði verið á nøkrum samgongufundi, soleiðis skuldi tað ikki skyljast, eg havi ikki biðið um nakran samgongufund. Tað sum eg segði tað í samband við, tað var tað at Atli Dam pástóð, at eg átti alla æðruna av øllum tí góða, sum hendan her samgongan fremur, og tað var Niels Pauli Danielsen her uppi og segði, at Pauli Ellefsen eigur alt, alla æðruna av øllum tí sum er hent og mær dámar ikki at fáa størri æðru enn eg eigi, eg havi einki ímótur at fáa tað sum kemur mær, men hattar er for stór æðra og tað var tí eg segði, at hattar kundi ikki passa og visti á at tað ikki ein gang hevði verið ein samgongufundur enn, men tað er eisini ein onnur forkláring uppá tað harra formaður, sum formaðurin veit, tað er tað at henda samgonga arbeiðir so væl saman, at tað er ikki so neyðugt við samgongu fundum sum tað hevur verið í øðrum førum.

Niels Pauli Danielsen (xfff.) viðmerking

Harra formaður

Tað er rætt, at sum eg segði í tá íð eg fyrri ferðina hevði oðrið, at tað var ringt, tað tali tá eingir landsstýrismenn eru inni í salinum, so er so ringt at tala og spyrja teir, og Pauli Ellefsen var á veg til hús í áðni, so fór eg og segði við hann, tú Pauli hattar passar ikki sum tú segði í gjar, hattar passar ikki, hattar var positivt órætt, hattar var ósatt, eg vil ikki brúka orðið lygn, tað er for sterkt orð at brúka, men tað var í grundina tað tað var. Hygg fyri at fáa hann at verða her inni, so segði eg tað við hann og nú váttaði hann tað. Hann hevur staðið, ikki bara í gjár, men eisini tá løgirnar vórðu til viðgerðar, hann segði tað, pengarnar verða ikki farnir, verða settir inn í landskassan, teir verða settir inn á eina bók í persónliga navnið tínum, tað er skeivt harra formaður. Nú váttaði Pauli Ellefsen tað, sum Líkningarráðið eisini váttaði mær áðrenn, at tað er skeivt, pengarnir fara í landskassan kann eg leggja aftur at nú, tí tað segði Líkningarráðið fyri mær. Pengarnir fyri bundnu uppsparingina í 1990 eins og teir fyri 1989 í landskassan, tí teir hava ikki apparat til at kunna skilja teir frá, teir verða kravdur inn saman við skattinum og teir kunnu ikki skilja teir frá og teir kunnu fyrst skilja teir frá í endanum av árinum 31. december 1990, eitt ár aftaná teir fyrstu pengarnir eru komnir inn, tá kunna teir skilja teir frá í øllum førum hava teir ikki apparat til at gera tað enn, hettar var tað teir svaraðu mær.

Pauli Ellefsen (sb) viðmerking.

Harra formaður

Eg haldi tað at eg gevi Niels Pauli Danielsen rætt í at tað hevði verið eitt fantastiskt strekt orð at rúkt um hattar har, at tað var lygn, tá einasta ósanna sum er sagt her so vítt eg veit, tað er tað at Niels Pauli Danielsen fortelur føroya fólki at fekk meg til at

bliva her. Eg havi akkurat verið heima hjá konuni og fingið ein góðan døguroa, tað kann ein og hvør fáa váttað, eg fór avstað og eg visti hvussu hekk saman, og tað er tað sum eg havi geitt frá, tað sum tað dreyðar seg um her, tað er tað at tann skipanin ikki er liðugt, sum skal til fyri uppás staðið, at skilja millum skatt og bundna uppsparing, og tí hevur Líkningarráðið fyrisligi, ella fyrislar, tað er møguligt at landsstýrismaðurin strammar tað eitt sindur upp, at teir sleppa at avrokna hettar her í einum tali til hvønn peningastovn, hvønn fyrsta í mánaðinum tá teir álíkavel sita og býta ímillum kommunur og landskassa, og so takað teir tað frá sum eina samalaða upphædd og seta tað inn á eina konti í hvørjum peningastovni, hettar her er uppskotið hjá Líkningarráðnum og verri enn hettar blivur tað í hvussu so ikki, og sum sagt eg góðtakið at mín bundna uppsparing, eg kann risikera at hon kemur at standa á somu konti, sum tnn hjá Niels Pauli Danielsen.

John Petersen (ff.)

Harra formaður.

Málið sum er til viðgerðar er løgmansrøðan og fíggjarlógin fyri 1990.

Tá hendan samgonga varð skipað, varð høvuðsdentur langdur á fíggjarviðurskiftini í landinum, ið vórðu blivin út av lagi vánaríig tey seinnu árini, og hettar meðan javnaðarflokkurin hevði leiðsluna. Hesin sami flokkur sum í dag stendur og rópar upp um ódunaskap hjá sitandi samgongu sum bert hevur sitið við ræðið í tríggjar mánaðir, og als ikki kann hava prógva sítt viðri enn. Hettar kann javnaðarflokkurin sjálvandi tilláta sær. Lurtar tú so eftir hesum flokki hvat hann hevur at føra fram, ja so hava teir onga loysnt at vísa á, tað var júst hesin flokkur, sum í seinastu samgongu sum umsat tvey málsøkir, ið hava størsta týdning fyri útflutningsvirðið hjá samfelagnum og vórðu tað tiskivinnan og alivinnan.

Harra formaður. Hesin partur av okkara vinnu er

koyrdur so dyggiliga fastur, sum aldrin fyrr, grundirnar eu vist fleiri, men eina kunnu vit 1 øllum førum sláða fast og tað er ov vánalig stýring frá almmenari síðu ella av teimum sum hava umsiti hesi málsøki hesi seinni árini.

Harra formaður, tað verður ofta sagt breiðir herðar skulu til at bera góðar tíðir, ikki kann sigast annað enn at tíðirnar hava verið góðar, men herðarnir hva ikki verið breiðir nokk hjá politttikarinum, tí er so statt í hesum landi. Tað er at vóna at mannskapið, ið nú skal venda skútuni so hon ikki kollsiglir, ikki blíva línir í køunum, men standa stirnir og takað tøkini í felag, ið skulu til fyri at broyta gongdina.

Við formansins loyvi fari eg endurgeva nøkur brot úr løfnansfrágreiðingini: Tað verður sagt soleiðis í løgmanstrágreiðingini: At nýggja samgonga ásannar at fíggjasralig gongd og støðin í samfelagnum krevur, at framd verða kravd nógv ymisk og heilt serlig tiltøk, skal tað eydnast at venda búskaparligu gondini rættan veg, eisini fer samgongan fyrst og fremst við bygnaðar broytingum, at rætta verðandi skeivleikar í fiskivinnuni og ger okkara høvuðsvinnu virknari. Í ár verða veittar fiskivinnuni størri afturberingar enn undanfarin ár. Í búskaparmálum sigur at við árslok 1988 var uttanlands-skuldin uppgjørd til 6,7 mia. í staðin fyri 4,6 mia. og so verður sat at tølini við árlok í 1984 vistu at almennu tølini tá vórðu nøkulunda rætt, soleiðis at tann høga skuldin hon er økt hesi seinnu árini. Somuleiðis sigur hann at nøkur av teimu nýggju góðu skipinum, sum komu seinastu árini eru longu farin á heysin og summi av teimum aftur av landinum, tað vil siga tað sama sum at ein partur av tí uttanlndsskuld, sum hesi skip vórðu fíggjaði við hann hava vit ikki vinnutól til staðar nú at betala aftur við. Handilsjavnahallið fyri 1988 vísir eitt hall uppá 1170 mió., og sigur hann, at har frá stavar gjaldsføriskreppan og tað er ikki minsti parturin frá gjaldsførisnalli í 1988 uppá 352 mió. kr.

Í tráð við hettar er heilt neyðugt at skeringar verða gjørdar á komandi fíggjarlóg um vit skulu ger okkum nakrar tankar um at fáa javnvág í aftur, vit hava

ásanna at herdan gongdin kann ikki halda á fram, hettar at tú brúka meir enn tú forvinnur skylir hvørt mansbarn í hesum landi, men tað vísir seg politikkarinum er hetta ringt at skilja. At vit skulu standa her og hálvgráta um at nú fær hesin ella hasin stovnurin ov lítið av peningum at arbeiðað við, tað kann væl verða, men ta hvørt húski í landinum í komandi tíðum kemur at hava minni pengar at húsast við, so skal tað sjálvandi eisini verða galddandi fyri allar teir stovnar, ið liggja undir fíggjarlógini ella sum fíggjarlógin umfatar, annars kemur hettar ikki at hava tað ávirkan, ið ætlanin var við hesi her tvungnu uppsparingi og við spartiltøkunum. Tað var jú ætlanin at man skuldi fáa broytt tí gongd sum var í samfelagnum.

Harra formaður. Hatta at spara á fíggjarlógini og seta tvungna uppsparing í verk verður nokk tíl at vit fáa samfelagshjulini at mæla aftur og tað at mæla rætt. Her mugu lóggávubroytingar til á fleiri økjum, so vit frameftir
verðuliga kunnu halda útreiðslurnar hjá tí almenna á einum lægri støði, soleiðis at man virkuliga kundi fari at tosa um krevja minni skatt og toll innn fyri at landskassin kann svarað hvørjum sítt.

Harra formaður. Tað hevur verið nevnt her trá tingsins røðarapalli, at skatturin skal leggjast á tær inntøkur, ið hava ráð at gjalda, sjálvandi skulu tær gjalða sin part, men um vit byggja eftir ti frágreiðing, ið Føroya líkningarráð gav út í august mánaða í ár, so siggja vit at inntøkurnar liggja frá 100 til 300 túsund eru heili 90% av øllum skattgjaldarinum í landinum. Hettar er tann parturin av fólkinum, ið hevur mest at svarða fyri og hann krevur hesa inntøkum um hann skal svarða hvørjum sítt. Tí harra formaður um vit skulu gera nakað í munar hjá bólki so má hettar verða leiðin ið gangast skal, útreiðslurnar hjá tí almenna mugu lækkast so minni verður kravt inn í toll og skatt.

Fiskivinnan fær stórar upphæddir á figgjarlógini og er hettar neyðugt sum støðan er í dag, men eigur tað ikki at verða gongdin fram eftir. Undir skipan av samgongu varð tosað um mangar ymiskar loysnir í gondar

vóru framettir, og vóni eg tað veður arbeitt hart við hesum málum sjálv um tey eru trupul at loysa. Vit verða noydðir at hava nýhugsanir á hesum øki, vit kunnu ikki smædnir fyri at royna tær, men vælsigaðir menn verði varligir. Læri av tí ið gjørt er undanfarið, og sum nú hevur so ómetarligar avleiðingar fyri tann føroyska búskapin, menn fyr tann skuld mugu tit ikki halda tykkum aftur, tí hettar hevur all stórar týdning fyri um leiðin skal verða gongd framyvir.

Í løgmansfrágreiðingini undir punkt 7, hvar viðt lesa um fiskivinnu, so verður sagt. Har sigur hann at flakavirkini høvdu eitt serliga vánaligt úrslit í fjør og tað verður neyvan betri í ár heldur, so her má tað almenna hjálpa til um tað er møguligt. Hugsa hevur fyrst og fremst um fígging til bíligari lán, kann tað gerast, fer tað at lætta munandi um raksturin. So verður tosað um at størsti trupuleikin hjá fiskivinnuni í 1988 og 1989 var at prísirnir fullu á avreiðingarnir minkaðu hertu førir so við sær at hvørt virkið fær ov lítið av ráðvøru til tað framleiðslu tey leggja seg eftur. Virkini mugu fáa meiri burtur úr einum minkandi tonsatali, tað blívu nevnt í frágreiðingi eisini tað sum varð viðgjørt undir samráðingunum um hettar her at mann átti at býta ráðvørðuna millum virkini, men so verður sagt at tað ikki er nøkur loysn, tí kemur bar at fororska tað, at øll virkir verða illa fyri tá. Men tað bleiv eisini nevnt tá, at man átti at leita aðrar leiðir til at fáa innkeypt ráavørðu, sum frystan fisk og virkan hann í Føroyum, og so vildi tann spurningurin verði loystur um tað var gjørligt. Tað er heilt klárt um tað varð ein gongd leið, og um tað varð møguleiki at tingið útført tað í lívið, so vildi tað haft ómetaliga stóra ávirkan og positiva ávirkan fyri tann Føroyska búskapin og landið. Amen í hesum sambandi kundi tað verið vert at komi inn á tað aftur, sum Anfinn Kallsberg nevndi um at lækkað umkostninganiveau, og vildi hettar gjørt okkum betri kappingarførar ímótui útheiminum og somuleiðis vildi hettar t.d. hjá flakavikrinukm og iðnaðinum gjørt raksturin munandi betur. Sjálvur haldi eg hettar skuldi ikki verið so ringt at gjøgnumført um politiskur vilji

er til staðar, og tað er heilt greitt at tað er ein leið fyri at virkini, fyri at flakavirkini kunnu standa seg betri at vit lækka niveauið, soleiðis at vit fáa tað alt bíligari, vit fáa arbeiðskraftina bíligari eisini, og tað vil forútsaka tað, at so hava vit eitt størri rakstaravlop, sum ger at virkini hava betri møguleika til at svarða hvørjum sítt. eg trúgvi at hettar væl kann gjøgnumførast um vit nova vilja til at gjøgnumføra tað, at lækka lønarlagið og lækka skattin samsvarðandi, soleiðis at tað sum eftir verður, verður tað sama at keypa fyri.

Harra formaður. Teir eru nógvir í mála alt so svart í hesum døgum, men ikki haldi at tað er rætta leiðin at ganga, læt okkum heldur verða eitt sindur positivar í okkara úttalilsum hetta skríms1ið um arbeiðsloysi, ið arostøðan royndir at mála upp, man ikki verða ringt sum tað er gjørt til. Hesi ørskapur vit hava livað í hesi seinastu
árini kunnu ikki halda áfram, og tað skilti ein og hvør. Fleiri vórðu teir í ávarðaði um hetta, men ikki var lurtað eftir og nú skríggja vit sum stungnir grísar, tí vit verða noyddi at taka avleiðingarnar av okkara egnu gerðum, men havi tað trúgv til føroyingin sum hevur riði mangan stormin av sær, at vit fara eisini at klára hendа um vit taka tøkini saman.

Harra formaður. Eg kundi hugsað mær at nortið við nakrar av kontoinum á fíggjarlógini, men ætlanin er ikki at fara so langt inn í tað, men tað er ein konto sum hevur við ellis og røktarheim at gera, har síggi eg, at vit eru komnir upp á við 7 mió.kr. á tað kontoina, men undir samráðingunum og í skipanini av samgonguni, tá var tað niðurført í undirskjali, um man hevur loyvi at nevna tað, at 12 mió.kr. skulu setast av á teimum næstu trimum árunum til ellis og røktarheim í Sandoynni, soleiðis, at tað kundi bliva gjøgnumført. Tað vón havi eg til landsstýrismannin sum umsitir hesi málini, at hann hyggur eftir hesum, tað er møguligt, at tað eru so nógvir pengar í hesum grunninum, at tað tart ikki at seta meir av, tað veit eg ikki, men vit vóna so, at tað kemur ein broyting í.

So var tað sjóvinnuskúlin. Har haldi eg, at menn vóru eitt sindur skjótir á tí, at fara og seta tveir klassar á stovn, í hesum tíðum, hvar man tosar um, at sparast skal og at tær almennu útreiðslurnar skulu ikki verða so stórar, so eg hevði hildi, at tað var nokk við, at man setti ein skúla á stovn við einum klassa í øllum førum tað fyrsta ári og man sá, hvussu gongdin var, man sá hvørja útreiðslur vóru bundnar at hesum og hvat gagn hetta kom at hava og hvussu hetta kom at virka í heila tikið, men so loypur man beint út í, og fyllir nógv meir fólk inn í ein skúla enn tað kanska er pláss fyri. So verður nevnt um broyting í skúlalóggávuni, har kundi eg hugsað mær, at nortið við tað eisini, og tað eru bygdaskúlarnir, tað verður bara tosað um hesar størru skúlarnir sum vit hava nokk av eftir míni meting, vit hava als ikki tørv á at byggja hvørki háskúlara ella studentaskúlar, men vit hava nakrar gamlar bygdaskúlar, sum eru upp í heili 100 ár og sum eru niðurkoyrdir so tað ikki er mansømiligt at undirvisa í og har kunnu vit t.d. bæði taka Sand og Skopun sum hava gamlar skúlar, men býtingsforholdi av útreiðslum til at byggja nýggjan skúla millum land og kommunur er soleiðis, skikkað, at meðan kommunurnar sum hava eitt stórt barnatal, tær hava ongan kjans til at investera teir pengarnar í, soleiðis, at man liggur á knøvunum og tí vildi tað verið gott, nú man tosar um, at broyta skúlalóggávuna, at man eisini tekur og broytur hetta býtingsforholdi og millum kommunur og land, soleiðis, at vit fáa barnaskúlar sum eru mansømiligir, tað má verða tað sum er meirkrevjandi at vit hava barnaskúlar og at vit kunnu læra tað yngra ættarliði, leggja gott í beinið hjá teimum og halda upp at at tosa um hesar framhaldsdeildirnar, soleiðis, at vit hava tann manndóm sum skal verða úti í vinnulívinum, sum skulu verða úti og gera nakað til nyttu har, hann situr bara á skúlabonkinum, tað ger einki um okkara unga fólk fer 2 ár út í vinnuna áðrenn tað sleppur inn á ein hægri skúla, ikki so at skilja, at ikki hægri skúlar skulu verða, men tað ger einki, um vit lata tað unga fólki sleppa út í vinnuna, 1-2 ár, áðrenn tú hevur møguleika fyri at sleppa inn á HF ella studentaskúla. So er

tað sjóvinnuskúlin, tað bleiv nevnt í hini samgonguni av Olaf Olsen, hann var inni á tí, at man átti at leggja sjóvinnuskúlan saman við 10 flokki. Eg siggi vit seta pengar av á fíggjarlógini eisini at hesa kontorna og har hevði eg vilja heitt á landsstýrismannin í skúla-málum, at nú tá ið vit broyta skúlalóggávuna, at vit taka hetta upp til viðgerðar og kanna eftir, um tað ikki er møguligt at leggja sjóvinnuskúlan inn í 10 flokk, tí tað er nokk so alkent millum lærarir og og onnur, at 10 flokkur virkar ikki soleiðis sum man av uppruna ætlaði at hann skuldi virka, so tað kundi verið gott, at man hugdi upp á tað. Grunnurin til útbúgvingar, har eru komnar 40 mió.kr. nú, tí studningurin skal latast frá tí føroyska samfelagnum og til tey ið ganga í skúla í Føroyum og tað er alt gott við tí, og tað eiga vit eisini at gera, men vit áttu eisini at hugt eftir tí, at tað skuldi verið lættari hjá hesum unga fólki, sum hevur eina summarfríðtíð upp á umleið 2 mánaðir, at verið úti og vunnið sær pengar í tí tíðini, uttan at skulu betalt tað aftur til landskassan og so heldur latið henda grunnin ikki lopin løskan, sum eg eri bangin fyri at hann ger eftir nøkrum fáum árum. Takk fyri.

Løgmaður

Harra formaður.

Tað var ein viðmerking til tað orðaskifti sum var beint frammanundan ella rættari sagt ein rættleiðing fyri at fáa tað upp á pláss, og eg skal loyva mær, við formansins loyvi at lesa burtur úr lógini um tvungna ella bundna uppsparing og har er tað fyri tað fyrsta uppsparingin fyri 1989, hon verður tó av landsstýrinum í seinasta lagi 1. juli 1992 renta við 5% og sett inn á bundna konto sum ein serlig eftirlønarskipan og verður peningur útgoldin eigarunum í fyrsta lagi tá hann verður 65 ár ella við deyða ella gjaldstrot, hatta haldi eg, at øll hava fingið fatur á. So er tað uppsparingin fyri 1990, hon verður útgoldin 1. oktober 1994 og hon er alla tíðina inn á ein bankakonto hjá viðkomandi persóni. Upp-sparingin fyri tey fylgjandi álmannakkaárini verður so

útgoldin hvønn 1. oktober hvørt 4. ár. Síðan kemur, at afturgjalding fer tó fram, tá ið tann uppsparingarskyldugi kemur í gjaldstrot ella doyr. Somuleiðis fer afturgjalding fram tá ið hin uppsparingarskyldugi verður 65 ár, tað vil siga, at fyri tað uppsparingina sum er frá 1990 og frameftir. Har lutaka pensionistar um teir tjena meir enn 110.000 kr. men teir fáa pengarnar aftur beinavegin ári eftir, bara fyri, at tað skal standa heilt greitt, at teir skulu ikki bíða í 4 ár.

Niels Pauli Danielsen (kff.) viðmerking

Harra formaður.

Nú gjørdi løgmaður viðmerking til tað frammanundan. Eg kontateri bara tað, at grannskoðarnir eru ikki samdir í hesum og hann upplýsti nakað skeivt men tað skal eg koma inn upp á, tá eg fái orðið.

Annars, bara ein viðmerking til John Petersen sum hevði orðið og hann segði, at 7 mió.kr. vóru settar av til røktarheimsgrunn og tað er rætt og tað ógvaðist eg yvir eisini og nú kennir hann samgonguskjali og undirskjali og tað kenni eg ikki, men eg kann fortelja honum og øllum samgongulimum eisini løgmanni sum eg hevði rokna við kom og fortaldi honum hetta, men tað gjørdi hann ikki, sjálvt um hann umsitir almannamál í landsstýrinum. At 4% av fólkapensiónsuppsháddini skal setast í henda grunnin, 4% av fólkapensiónini fáa vit frá danskarum í blokkstuðli. Vit fáa 777 mió.kr. og har av, eru 4% umleið 12 mió.kr. til at seta í henda grunnin, nú brúkar landsstýrið pengarnir sum áttu at fari frá danskarunum í henda grunnin m.a. til røktarheimið í Sandoynni til at dekka fiskivinnukreppuna fyri. Hetta, er at taka frá pensionistunum og brúka tað til nakað annað, tað haldi eg átti ikki at verið gjørt.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Harra formaður,

Tá ið løgmaður sigur, at uppsparingin frá 1990 fer inn á eina serliga persónliga konto, so er tað sama sum

eg segði á gjár og hetta var avtalan, hetta vóru vit samdir um. men tað sum nú visir seg, tað visti eg nevnliga ikki í gjár. tað er tað, at líkningarráði sigur, teir eru ikki lidnir við at gera skipanina soleiðis, at man kann ikki náða hetta í 1990, tað vil siga, at tað verður sett inn kollektivt. So tað skuldi ikki undra meg, um uppsparingin hjá løgmanni og hjá mær, koma inn á sonu konto. Eg havi álit á, at henda samgongan skipar soleiðis, fyri, at tað verður útgoldið til røttu merninar tá ið tíðin komur.

Lasse Klein (sj.) viðmerking

Harra formaður.

Tað sum vit hava fingið konstatera í hesum orðaskiftinum, tað er, tað sum vit væl ikki vistu frammanundan, tað var tað, at eisini tey sum eru omanfyri 65, 66 og 67 og 75 ár eisini tey, verða kravd fyri tvungna uppsparing, tað er komi klárt og tíðiliga fram í hesum orðaskiftinum, men tey fáa sjálvsagt pengingin aftur, tá ið 12 manaðir eru farnir, men hetta er so ein konstatering og eg haldi, at man eigur at upplýsa fólki um hetta eisini.

Henrik Old (jv.)

Harra formaður.

Nú er einki undarligt í, at fólk fara at ivast. Nú hava vit hoyrt báðar hesar høvuðsrevisorarnar í okkara landi og tað gongur illa hjá teimum, at blíva samdir um hvussu henda her tvungna uppsparingin virkar og stadivekk eru báðir rúkandi ósamdir. Undir seinastu samgongu fyri at fara yvir til okkurt annað, tá komu nógv uppskot her á ting um keyp av húsum, til tað almenna, tað var serliga í Havn
Eg haldi næstan, at øll tey uppskotini fullu, tað er møguligt, at okkurt kom í gjøgnum, men ikki sum eg kann minnast. Samgongan atkvøddi ikki fyri teimum, stundum var tað Tjóðveldisflokkurin, sum ikki atkvøddi, stundum var tað Javnaðarflokkurin, sum ikki atkvøddi og stundum

hvørgin, so at hetta verð einki burtur úr hesum. Grundirnar vóru tær, at menn hildu, tað var kanska nokk av hesum nú.

Nú er landsstýrið farið at royna eina smartari máta, nú skal man leiga í staðin fyri. Eg havi nevnt tað fyrr, tað verður farið í holt við at leiga eitt veldugt hús nú úti á Argjum, og kanska tað merkiligasta av øllum er tað, at tað verður lagt afturat, at tað er ikki ætlanin at uppsiga tey leigumálini, man fer úr, also man fer úr einum húsi í eitt annað veldiga stórt hús, men man skal behalda tey, sum man fer úr. Tað virkar eitt sindur løgið, tá ið man skal skera niður, í heila tikið er handa leiguuppbøddin óhuganlig.

Eitt annað var Arbeiðseftirlitið, tað stendur á fíggjarlógini, deildirnar úti um landið standa á 0 á fíggjarlógini. Eg skilji tað soleiðis, at tað er væl ikki ætlanin at niðurleggja tær, men tað stendur alt undir tí játtanini til Arbeiðseftirlitið í Havn. Nú er tað eitt sindur niðurskorið tað samlaða, men tað er eitt sindur undarligur máti, at tey, sum skulu stíla fyri úti um landið á Arbeiðseftirlitinum, ikki hava sína játtan at halda seg til, men skulu verða stýrd av Arbeiðseftirlitinum í Havn.

Mær vitandi so hava Arbeiðseftirlitini úti um landið virkað væl, og tað hevur kanska heldur verið hin vegin við tí partinum í Havn. Tað hevur tókst sum, at tey hava líka sum havt til uppgávu at geva undantak til tað, sum verður avgjørt á Arbeiðseftirlitinum úti um landið. Í fleiri førum er tað soleiðis, at vendir man sær til Havnar, so fær man undantak, og tað er ikki serliga heppið, um tað verður skorið niður á hasum økinum.

Harra formaður. Eg ætlaði at koma eitt sindur meira inn á fiskarí, tá ið eg hevði orðið seinast, men tað útsetti eg, tí at landsstýrismaðurin var ikki til staðar. So óheppið er tað, at nú er hann heldur ikki til staðar, men um tað skal koma við hesuferð, so er man noyddur at koma við tí nú.

Tað hevði nokk ikki verið neyðugt at sett forboð fyri stórhvalaveiðu, um stórhvalurin kom so sjáldan upp at blása, sum Jógvan Olsen hevur vist seg nú undir hesi

viðgerðini. Hann var so her og helt eina ræðu, og tað skuldi koma nakað fram um hansara tankar um fiskivinnu sum so nú framyvir. Tað vóru nøkur tøl ramsað upp, sum eisini vóru í lagi, men teir nýggju tankarnir vóru ikki nógvir at fáa eyguni á.

Hann nevndi nakað um eina auktiónsskipan, og nú er tað komið har niður til, at tað skal verða ein telefonisk uppboðssøla. Tað er í hvussu so er nakað nýtt, at man fer í holt við eina telefoniska uppboðssølu. Ein skrivstova skuldi setast á stovn, og hon skuldi so formiðla hetta út til flakavirkini. Tað er møguligt, um man ætlar at avtaka tað aftur, at tað er tann lættasti mátin at avtaka tað uppá, men ein teletonisk uppboðssøla fer ikki at gera somu nyttu sum ein vanlig uppboðssøla. Tað er møguligt, at ein vanlig uppboðssøla heldur ikki verður tað besta í Føroyum, men man burdi royna í smáum at byrjað við tí. Eg setti ein fyrispurning einaferð aftan á óiavsøku. Av ymiskum grundum kom tingið ikki saman, hetta dróg so út og tað er líka við at verða óaktuelt við tí ár.

Jógvan Olsen spyr, um hann skal taka trolararnar út ella línuskipini út, tá ið tað kemur til kondemnering og annað, tá ið seljast skal longur burturi. Eg haldi, hann er longu byrjaður. Nøkur skip í Suðuroynni eru nú kondemnerað, og av teimum, sum royndu í Íslandi, eru tvey eftir. Í staðin fyri kanska at býta teimum ein størri part av tí, sum leyp av nú, ið onnur fóru burtur, so hevur man valt eina aðra loysn, tað er heldur at skera tey niður og flyta tað, sum leyp av, aðrar vegir.

Jógvan Olsen sigur, at man skal animera til betri góðsku. Tað er keðiligt, at man noyðist í holt við hetta undir eini sovorðnari viðgerð, men tað er eitt rættiliga umráðandi, at man fær tað fram, tí tað skal helst livast fleiri ár.

Í fjør vórðu býtt eini 1200 tons til tey skipini úr Suðuroynni, sum fiskaðu undir Íslandi. Nú er hetta komið niður í móti einum 500 tonsum, og grundin er sum sagt tann, at nøkur skip eru farin burturúr. Tey, sum eftir eru, hava helvtina, annað hevur helvtina av tí, sum hini hava í landinum og hitt hevur triðingin av tí,

sum onnur skip í landinum hava, tá ið tað kemur til íslandsveiðu.

Jógvan Olsen segði, at nú var tilin vaskað og karað, og nakað var farið burturúr, tað er tað nógv, sum týður uppá, tað er ikki Javnaðarflokkurin - Pauli Ellefsen sigur nei - men tað er heilt aðrar vegir.

Kvotan í Barentshavinum fór niður í helvt í ár, fylgjurnar eru tær, sum vit hoyrdu í útvarpinum í kvøld, at skipini fara ikki avstað aftur í ár. Tað vóru nakrir her, sum ráddu til ikki at taka undir við hesum noregssáttmálanum, tí hann var ikki nóg góður og heldur bíða nakrar dagar og vita um man ikki kundi fáa eitt frægari úrslit, tíverri kundi tað neyvan verða, men hetta vann ikki frama og úrslitið hava vit so.

Tað gekk serliga út yvir teir trolararnar, sum fiskaðu ísfisk. Teir vóru jú nøkur ár eystanfyri í fjør og fyrrárið. Her vóru tað serliga nakrir bátar, sum gjørdu útslagið til flakavirkini. Tað var eitt gott ikast, serliga í illveðrinum í december og januar, tá ið hesar stóru lastirnar komu eystanífrá. Tað varð so av engum hesaferð.

Tá ið kvotan í Íslandi á sinni varð ásett, tá var grundarlagið undir henni veiðan, sum var farin fram árini frammanundan, m.a. tað, sum trolararnir, ið royndu við Ísland, tá fiskaðu. Har áttu skip í Suðuroynni helvtina av tí, sum veitt varð tá.

Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin fóru til Íslands fyrst í 80-unum fyri at fáa meira fisk. Úrslitið varð, at kvotan fór niður í helvt. Hetta raktí serliga meint trolararnar úr Suðuroynni, teir vórðu so útblaðaðir, sum vit minnast. Tá ið tað nú leypa nøkur fá tons av frá teimum skipunum, sum fóru út, so var tað ikki annað enn rímiligt, at tey, sum eftir vórðu, fingu ein part, sum var nøkulunda á hædd við tey, sum eru aðrar staðir í landinum.

Anfinn Kallsberg býtti tað fyrsta býtið, og hann hevur tikið riviliga lil til sín sjálvan ella nar á leið, sum hann sjálvur er. Nú ein dagin boðaði útvarpið frá, at 2400 tons vóru eftir, men av teimum er ikki eitt kilo býtt til hesi bæði skipini, og enn í dag eru fram-

vegis eini 1500 tons eftir, sum Jógvan Olsen er komin í neyð av, hann veit ikki, hvat hann skal gera við tey hesi 1500 tonsini.

Annað av hesum skipunum er ikki so stórt, so tað hevur ongan kjans í ár. Tað er ikki soleiðis at skilja, at eg missunni teimum, sum eru har yviri og fiska, væl gagnist teimum, tí tað er ikki tað stuttligasta.

Jógvan Olsen endaði við orðunum, at menniskjan er ein løgin skapningur, tað kann yvirliva við næstan ongum. Tað fari eg kortini at ivast í, at man í longdini kann yvirliva við næstan ongum, og er tað ætlanin, at hesi skuldu útveljast, so mugu teir fáa at vita tað. Kanska er vandin tann, at góðskan hevur verið serliga góð, og tað er tað kanska, sum pínir menn, tí hetta var ein royndi, sum seinasta landsstýrið var sant um at seta í verk fyri at royna, um man ikki kundi onkrar vegir fáa góðskuna eitt sindur betri. Var ein meining í tí, so skuldi tað farið øvugtan veg. Tað burdi kanska verið sum við fótbóltinum, at tann, sum hevði tað versta úrslitið, tann, sum lá niðastur í góðsku, hann fór í aðru deild, og eir annar rykti upp, tá kanska var ein møguleiki fyri, at menn fóru at gera meira fyri at gera góðskuna betri og hetta burdi kanska serliga verið galdandi fyri íslandsveiðu.

Jú, harra formaður. Rætt er, sum Jógvan Olsen sigur, vaskað og karað er, men úrslitið, haldi eg, man hevur loyvi til at fílast á.

Løgmaður

Harra formaður.

Tað var bara ein heilt stutt rættleiðing. Tað varð komið inn kontoina hjá Arbeiðseftirlitinum á fíggjarlógini. Har stendur fyri 1990 null út fyri øllum deildunum. Tað skal ikki skiljast sum, at deildirnar verða niðurlagdar, tað er bara ein redigering av fíggjarlógini soleiðis, at tað er gjørd ein samanløgd játtan til Arbeiðseftirlitið, sum stendur á tí fyrstu kontoini, og so hevur Arbeiðseftirlitið møguleikar fyri innan fyri ta játtanina sjálvt at býta tað í millum tær ymisku deild-

irnar.

Tað, sum bara liggur fast, er, at deildin í Vestmanna verður ikki sett á stovn fyribils í øllum førum.

Edmund Joensen (sb.)

Harra formaður.

Samgongan, sum tók við 22. juni í ár, hevur átikið sær at royna at rætta upp á tá skeivu gongdina á búskaparliga økinum, sum hevur eyðkent okkara samfelag seinastu nógvu árini.

Sjálvt um útflutningur føroyinga bert øktist frá frá umleið 1800 mió. í 1985 til 2.000 mió. í 1988 ella við góðum 200 mió.kr., so øktist fíggjarlógin í sama tíðarskeiði frá 1400 mió. í 1985 til umleið 2100 mió. í 1988 ella við 700 mió.kr., og er hetta uttan danska studningin upp á umleið 7-800 mió.kr.

Harafturat kemur, at uttanlandsskuldin í sama tíðarskeiði er vaksin við umleið 1.000 mió.kr. um árið. Tað er ringt hjá mær at fáa eyga á nakað, sum rættvísger hesa ovurstóru øking. Sum flestu Føroya fólk vistu, so mátti hesin ørskapur fáa ein bráðan enda, og vit eru nú í tí støðu, at allir lángevarar í útheiminum hava skrúvað fyri fyri nýggjum lánum til Føroyar. Um vit vilja tað ella ikki, verða vit noydd at minka um nýtsluna og at leggja doyir á at økja um útflutningin.

Samgongan hevur sett tiltøk í verk, sum avmarka nýtsluna nakað, og um hesi tiltøk eru nóg mikið kemur tíðin at vísa.

Føroya fólk hevur hoyrt almikið frá hesum røðarapalli um, hvør og hvør ikki hevur skuldina av, at so illa statt. Eg skal ikki taka henda táttin upp, men heldur viðgera tveir ítøkiligar møguleikar, sum kunnu økja útflutning okkara yvir nøkur ár við umleið 1.000 mió.kr. og sum vil økja arbeiðið munandi í framleiðsluvinnuni.

Annar møguleikin er at keypa rundan, frystan fisk til fiskavirkini. Hin er at útvega alivinnuni rakstrarpening í uppbyggingartíðini.

Tann fyrri møguleikin er at keypa avhøvdaðan,

frystan fisk og virka hann her í landinum. Okkara aktiv á hesum økinum eru tey yvir 20 fiskavirkini úti um landið, og sum ikki fáa nóg mikið av råvøru frá okkara egnu skipum. Hesi virkir hava óivað tvífalt so stóra framleiðsluorku, enn tey fáa fisk til í dag. Hitt aktivið er, at vit hava arbeiðsmegi í landinum, sum dugir at hagreiða ella at tilvirka hesar fiskavørur, talan er um. Hetta seinast nevnda, tørvandi arbeiðsmegi, hevur verið høvuðseyðkennið seinastu nógvu árini. Virkini hava verið ómannað, og neyðugt hevur verið at sent boð eftir fólki úr útlondunum. Skipini hava havt somu trupulleikar við manningartroti.

Hetta kundi vit havt umgingið, um vit ikki settu so ovurhonds nógv í gongd í senn úti um landið av sokallaðum óproduktivum virksemi. Men innynda vit okkum, at støðan er broytt soleiðis, at fiskaídnaðurin aftur fær nóg mikið av arbeiðsmegi og at vit keypa eini 30.000 tons av avhøvdaðum, frystum toski, sum er ein marknaðarvøra í dag, so vísa tær smáu royndirnar, sum eru gjørdar í Føroyum tá síðstu tíðina, at virðisøkingin kundi ligið um einar 8 kr. fyri kg ella 240 mió.kr. til føroyska samfelagið, olla meira enn helmingin av tí, ið fiskavirkini tilsamans gjalda í lønum um árið. Hetta uttan at gera tær heilt stóru íløgurnar. Har attur í móti gevur hetta støðuga arbeiðsmegi á virkjunum og harvið eisini betri trivnað.

Eg skal bert í hesum sambandi nevna, at á henda hátt arbeiða danir í dag, og hava arbeitt á henda hátt í fleiri ár, og hesin fiskur er mest keyptur frá USSR.

So er tað alingin. Her gevast møguleikar sum ongantið fyrr. Vit hava so gott sum alla råvøruna í landinum, vit hava tann støðuga hitan í sjónum, og fiskur, sum ikki verður nýttur til matnað, fiskaídnaðarfiskur og slógv annars frá fiskaídnaðinum, verður nýttur til fóður og kann umgerast til laks annaðhvørt við sloydfóður ella turrfóður, framleitt í Føroyum.

Henda vinnan hevur sum øllum kunnugt nøkur ár á baki og restar nakað í at koma fyri seg orsakað av byrjunnartrupulleikum, sum sjáldan sleppst undan so sum smoltmangul, sjúkum og øðrum. Vit mugu gera okkum

greitt, at henda vinnan er komin fyri at vera verandi, og ikki slepst undan at útvega neyðuga rakstrarfígging til vøksturin í framleiðsluni, sum helst er einar 150 mió.kr. um árið tey næstu árini. Hetta er peningur, sum má fáast til vega uttanifrá, og júst tí er alneyðugt at vísa á eina politikk, sum er tróverdigur, og sum gevur okkum neyðuga kreditvirðið aftur.

Eydnast okkum at útvega neyðuga peningin til vøksturin í alingini og annars at skipa fyri, kunnu vit longu næsta ár taka eini 10-12.000 tons, sum væntandi kunnu seljast fyri umleið 500 mió.kr.

Hetta saman við tí økta virkseminum á fiskavirkjunum kann merkja einar 1.000 mió. um árið um eini 2-3 ár í øktum útflutningi, um viljin er til staðar.

Í endanum av røðu síni sigur løgmaður á ólavsøku, við formansins loyvi, um teir tríggjar flokkarnar, sum nú skipa landsstýrið, at teir eru politiskt ógvuliga ósamdir, men teir eru gingnir saman fyri at taka saman hendur at endurreisa føroyska búskapin og fyri at fáa samfelagshjólini at mala og at mala rætt.

Eg eri samdur við honum, tá ið hann endar við at siga, at gøtan er gongd, men um tað eydnast at ganga hana og vinna á mál, velst um hegni, ágrýtni og vilja politikaranna og upp aftur meira um undirtøku fólksins.

Jógvan við Keldu (Sf)

Harra formaður.

Tað var aftaná, at eg hevði hildið mína fyrru røðu, tá var eg fyri so vítt ákærdur fyri av Signari Hansen at hava hildið eina óhøviska røðu, og Vilhelm Johannesen, æraði tingmaður, segði, at eg førdi eitt hetz í móti tí almenna.

Nú er tað soleiðis, at fyri at svara Signari Hansen, so er tað soleiðis, at landsstýrið er ovasti myndugleiki yvir stovnunum, og tað er landsstýrisins skylda, tá ið vit nú hava fíggjarlógina fyri, at man fram yvir fær stovnarnar at koyra og serliga, tá ið vit tosa um skerjingar, so er tað heilt náttúrligt, haldi eg, at man frá tingsins røðarapalli tekur mál upp, sum hoyra

við til figgjarlógina, tí vit mugu skerja og vit skulu skerja, og tað verður ógvuliga týdningarmikið, at man effektiviserar allar stovnarna.

Hvat Vilhelm Johannesen viðvíkir, so er tað soleiðis, at Jóngerð Purkhús, landsstýriskvinna, segði her í morgun, at Vilhelm Johannesen hevði fingið málið aftur, nú hann var komin út úr landsstýrinum. Eg trúgvi, at Vilhelm Johannesen er ógvuliga ótta raskur, tá ið tað snýr seg um at tosa um nakað, sum hann ikki hevur við at gera.

Eg minnist í fyrstuni, tá ið eg varð býráðsformaður í Klaksvík í 1981, tá hevði Vilhelm Johannesen sitið í eini samgongu og var farin úr samgonguni hálvt ár frammanundan. Tá ið so roknskapurin kom fyri, tá vildi hann bara sleppa at klæða henda her roknskapin, sum hann partvís hevði verið við til, av, tá minnist og, at eg segði við Vilhelm Johannesen á tí fundinum, tá sótu Vilhelm Johannesen og eg í samgongu - løgið nokk, at tað eru teir roknskapirnir, sum vit sjálvir koma at hava í hesum árunum, sum koma framyir, sum vit koma at standa við fullari ábyrgd fyri.

Tá ið Vilhelm Johannesen tosar um eitt hetz, so kann eg ikki lata vera við at nevna her í kvøld, at hevur nakar ført eitt hetz í móti føroyska vinnulívinum bæði á landi og á sjógvi frá tingsins røðarapalli og tosað um niðursetani um hetta her, so er tað Vilhelm Johannesen, og tað haldi fyri so vítt, hava teir ikki uppiborið serliga ikki, tá ið tað ikki viðkemur málinum. Tað, sum eg kom við, viðkom málinum.

Eg skal so fara víðari.

Tá ið vit hyggja at støðuni í Føroyum í dag, so er tað soleiðis, at tað er vorðið soleiðis, at samfelagið er dýrari og dýrari at koyra. Vit eru komin til tað, at arbeiðstíðin hjá tí fastlønta er frá 8 til 16, vit hava 5 vikurs ferie, og tá ið so henda ferian og hesin kl. 8-16 arbeiðsdagurin er liðugur, so skal man omman á tað heila verða við í so stóran mun at gjalda frítíðina eisini. Tað sigur seg sjálvt, at eitt samfelag sum hetta kemur og má verða ómetaliga dýrt at koyra.

Hyggja vit at teimum hagtølum, sum standa í Hag-

tíðindi í samband við lønútgjaldanina, so síggja vit, at tað vóru 4,2 mia.kr. útgoldnar í lønum og 1,2 mia.kr. av tí var fiskivinnan, iðnaður og landbúnaður, meðan hinar 3 mia.kr. vóru til annað. 1,2 mia.kr. av hesum 3 mia.kr. vóru til almennar tænastur, t.v.s. at almennar tænastur var tað sama, sum útgoldnar lønir til fiskivinnuna og iðnaðin, og tað fyrikemur mær at vera ómetaliga nógv.

Tað er Sjálvstýrisflokkurin, sum heldur fram við at tosa um at skerja bíðipeningin og skerja politiska upplýsing. Annar tosar um tað, samstundis leggur hin aftur at útreiðslusíðuni alla somlu tíðina. Fróðskaparsetrið skal ikki skerjast, men har skal meira uppá, Leikpalur Føroya, har skal meira uppá, sjúkrahúsøkið, har skal meira uppá. Vit mugu gera okkum greitt, at skulu vit fáa hetta samfelagið attur at virka, so mugu skerjingar til, og tað havi eg vist ferð eftir ferð.

Eg haldi, at eg skal taka eitt mál upp nú, sum viðvíkir Studentaskúlanum í Kambsdali. Tað er eitt mál, sum kemur fyri í morgin. Har var tað soleiðis, at í 1986 varð ein bólkur settur niður til at arbeiða og kanna, um tað vóru møguleikar fyri at taka og gera eina studentaskúla undirvísing í Klaksvík. Tað varð gjørt eitt álit og í tí álitinum, har endar tað soleiðis, og tað er tað, sum eg kundi hugsa mær at biðið landsstýrið, avvarðandi landsstýrismaður Signar Hansen situr her, við formansins loyvi: Nevndin er tí komin til ta niðurstøðu, at undir verandi umstøðum her til at fara undir studentaskúlaundirvísing í Klaksvík á 1.g støði bæði fyri málsliga og matematiska deild, hetta skuldi ikki ført við sær størri útreiðslur til raksturin heldur tvørtur í móti sambært omanfyri nevndu orsøkum. Eg vóni, at hetta málið verður tikið við, tá ið vit nú fara at tosa um meira um studentaskúlan.

Tað, sum eg vil vísa á, er tað, at eg krevji ikki nakað sum helst meira í hesum sambandi. Vit hava tosað um skerjingar, og tað er rætt, at vit skerja. Man kann ikki hava bæði sum bæði Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin skerja og brúka sama pening samstundis.

Líka nøkur orð til Eliesar Arge, sum tosar um ein dreym, sum hann hevði havt, men hann hevur fleiri dreym-

ir. Hann hevur eisini ein dreym, og tað er at gera Landssjúkrahúsið til eitt ríkissjúkrahús. Vit eru 47.000 menniskjur í Føroyum, og tað mugu bæði Eliesar Arge og aðrir gera sær greitt.

Eg haldi, tað var Søren Kirkegaard, sum segði nakað soleiðis, at man kann ikki ferðast í Frankariki við einum korti av Danmark. Hatta er soleiðis, at eg trúgvi ikki, man kann samanlíkna føroyska samfelagið og at vit skulu hava alt tað, sum aðrir hava, tí at vit eru so fá, og vit eru so fjarstødd, sum eg fyrr havi nevnt.

Henrik Old var inni á tí, at tað vóru menn sagdir upp á strandferðsluni og tað harmar meg. Hin vegin er neyðugt við ávísum skerjingum. Vit hava sæð, sum eg havi nevnt fyrr, norðuri í Klaksvík har liggja ikki minni enn trý skip fýra, um vit taka "Skálaberg" við, og har er faktisk ein uppsøgn av 30 monnum á hvørjum skipi. Tað er 90 ella 120, 130 menn, um man tekur allar á við, men tað verður jú ikki talað um hetta her.

Vit siggja t.d., at sjónvarpið fer eftir leiðaranum fyri strandferðsluna beinanvegin og hann fær loyvi til at úttala seg um hesa skandaluna, at tað eru 15 fólk uppsøgd á strandferðsluni, men hitt verður fyri so vítt ikki tikið upp á tunguna.

Vit skulu minnast til, at tað er av ógvuliga stórum týdningi, at vit fáa framleiðsluna, nú var æraði tinglimur Edmund Joensen her uppi og tosaði um at keypa skráskornan fisk frá russum og aðrastaðni og eg trúgvi, at hetta kann koma at bæði arbeiði og geva pengar og tað er ómetaliga týdningarmikið, at vit koma aftur til hatta har, at tað er framleiðslan, sum skal avgera, hvussu nógvar skúlar vit skulu hava, hvussu nógv sjúkrahús vit skulu og hvussu nógvar tænastur vit annars skulu hava. Tað er til eina og hvørja tíð framleiðslan, sum má koma at avgera hetta. Vit hoyra tingmenn tosa um, at tað er øðiligt, sum tað fara nógvir pengar í fiskivinnuna, men tað er ikki tað, pengarnir eru brúktir upp á, men allar aðrar tænastur og so verður tað so, at fiskivinnan fær skuldini.

So er tað eitt annað, sum eg havi hugsað um, tað er, at man ofta hevur bæði land og kommunur, hvar man

landið letur 20% partapening, tá lð virkir og annað verður sett á stovn. Eg trúgvi, at tað er rætt.

Nú tekur løgmaður soleiðis til í løgmansfrágreiðingini, við formansins loyvi, hann sigur soleiðis á síðu 20, í framtíðini verða almenn veðhald burtur í figgingarskipanini. Eg trúgvi, at hatta er eitt ógvuliga gott mál at seta sær og eisini hetta at oftast, tá ið eitt felag klárar at skaffa tey 80% av einum partapening so skuldi ikki verið løgið, um tey kundu skaffað hini 20% aftrat.

Áðrenn eg gevist, kann eg líka siga frá um einaferð, eg var í eini kommunu í USA, hon var upp á 6.000 fólk. Har var eitt virki sett á stovn, hvar teir keyptu stykkið og planeraðu tað og teir settu 1.800 fólk í arbeiði. Við tað, at teir settu 1.800 fólk í arbeiði, skuldu teir ikki gjalda nakrar skatt, og har hevði Javnaðarflokkurin ikki livað væl, har eitt slíkt felag slapp at hava sínar pengar uttan at gjalda skatt av teimum, men teir sóu soleiðis upp á tað, at tað var av alstórum týdningi, at man tekk sett øll hesi fólkini í arbeiði, teir rindaðu ein virðisskatt av økinum, tað var tað heila. Eg haldi, at føroyingar skuldu lært av hasum, at man heldur koyrdi tað og vendu ti á soleiðis, at man ikki kom til hesi veðhaldini og til almennan partapening. Takk fyri.

Vilhelm Johannesen (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Nú segði seinasti háttvirdi røðari Jógvan við Keldu, at tað ber ikki til at ferðast í Fraklandi við einum korti av Danmark, og tað er júst hetta, sum Jógvan við Keldu ger.

Vit ásanna, at tað er vinnan, sum er í kreppu, tað er serliga fiskivinnan, flakavirkir og skip og aðrir partar av vinnulívinum við, og so fer Jógvan við Keldu her av tingsins røðarapalli í gjár og leggur eftir teimum almennu starvsfólkunum.

Hann leggur eftir almennum starvsfólkum og almennum stovnsleiðarum og han sáðar ein iva um, annaðhvørt

hesi fólkini arbeiða effektivt ella ikki. Um tað ikki ber til at rationalisera nøkur av hesum fólkunum burtur, um tað ikki er upp á sítt plass, at nakrir av hesum stovnsleiðarunum verða viknir á dyr. So koni eg aftur í dag og sigi, hann skal leggja hesar stovnarnar undir lupp, hví so ikki fara har við luppinum, sum trupulleikar eru hví ikki leggja vinnulívið undir lupp og hví ikki leggja virkiseigarar undir lupp og heilsølumenn og grannskoðarar o.s.fr. So kemur hann her og sigur, at eg havi tosað niðursetandi um vinnulívið, tað haldi eg avgjørt ikki, at eg havi gjørt.

Jógvan við Keldu nýtist ikki at fara so langt, hann kundi bara farið ein túr í Norðuroyggjum tað er so høgligt og har kundi hann spurt reiðaravirkir og fiskaavirkir hvussu mín støða yvir fyri teimum var tey 4 árini, eg sat í landsstýrinum. Tað kundi snúgva seg um umbygging av skipum, um bygging av skipum, um fiskiloyvir, um stuðul til royndarfiskiskap, tað kundi snúgva seg um stuðul til umbygging ella umlegging av fiskaðarvirkjum, um stuðul og veðhald til bygging av nýggjum fiskaðarvirkjum. Eg kann minna á, at 2 smoltstøðir komu í Norðoyggjum tey 4 árini, 11 sjógvalistøðir komu o.s.fr. Jógvan við Keldu, kann fara og tosa við øll hesi fólkini, so fær hann at vita, hvørja støðu eg í veruleikanum hevði í vinnuni, hon var alt annað enn negativ. So strikar hann undir, at eg havi sitið í býráðnum í samgongu, ella lógið nokk, eg skal siga Jógvani við Keldu tað, at eg sat í Klaksvíkar býráð í 10 ár, harav var eg 9 ár í samgongu, tað var tað eina árið, eg fór úr eini samgongu, av tí at samgonguavtalan ikki varð hildin.

Lasse Klein (sj.) viðmerking

Harra formaður.

Tað er háttvirdi tingmaðurin Jógvan við Keldu, sum hevur hug at taka rættin frá okkum at gera viðmerkingar til fíggjarlógaruppskotið. Hartil er at siga Jógvani við Keldu, at vit mugu hava loyvi til at gera viðmerkingar, og vit, haldi eg, hava sagt tað klárt og týðuliga, at vit hava einki í móti sparingum. Vit hava víst á eina røð av sparingum í viðgerðini, sum er farin fram, bæði

nú og eisini framanundan. Eg vil gera púra greitt yvir fyri samgonguni, samgongumonnum, landsstýri og Føroya fólki, at vit eru ikki samdir við samgonguni og Jógvan við Keldu um mátan at spara upp á, har í millum annað talan er um at áleggja brúkaragjøld o.s.fr. Tað er bara ein spurningur, hvar alt hetta endar, vil koma sjálvsagt við okkara uppskoti til figgjarlógina, tá ið tann tíðin kemur.

Jógvan við Keldu (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var Vilhelm Johannesen. Tað er í øllum førum nakað nýtt, at Vilhelm Johannesen ásannar, at landið er í kreppu, og tað haldi eg er ógvuliga týdningarmikið, men eg haldi, at tað er ógvuliga seint, at hann ásannar tað nú, at hann ikki situr í landsstýrinum meir.

Eg havi ikki ført nakað hets í móti nøkrum starvsfólkum, eg havi bara sagt, at tað er ómetaliga vigtigt, at vit fáa stovnarnar at koyra, og at teir mugu gera sær greitt, at teir mugu skerjast. Vilhelm Johannesen tosar um, at hann hevur gjørt so øðiliga nógv í sambandi við virkir í Norðoyggjum. Vilhelm Johannesen hevur altíð verið lagaligur, tá ið tað er at gera nýggj virkir, men so skjótt sum tey fara at vinna pengar, so er hann ikki væl nøgdur meir, tað síggja vit á skrivingini, og tað er tað, sum eg var inni á.

Lasse Klein, sigur, at eg havi hug at taka rættin frá teimum til at ummæla og umrøða løgtingsfíggjarlógina. Eg havi ikki rætt til at taka nakran rætt frá einum flokki sjálvt um hann er lítil, tað skal Lasse Klein minnast til. Tað, sum eg sigi, er tað, at Lasse Klein kemur her ferð eftir ferð og sigur, at vit hava eina rød av skerjingum, hvar er henda røðin? Jógvan Sundstein, løgmaður spurdi hann í áðni, men hann er ongantíð ein komin við eini rød, og tað er tað, sum eg meini, bara at koma við eini rød av skerjingum uttan at koma við nøkrum konkretum, tað er tað, sum restar í hjá Lassa Klein, tí meðan annar hugsar um at skerja bíðipeningin og politiska upplýsing, so leggur hin aftrat við

Fróðskaparsetrinum og Leikpallir Føroya og aðrari mentan og tað er tað, sum ikki ber til. Tað ber ikki til at spara og brúka teir somu pengarnar samstundis heldur ikki hjá Sjálvstýrisflokkinum.

Niels Pauli Danielsen (kfff.)

Harra formaður.

Fyrst nøkur orð til tann seinasta talaran, hátt-virða tinglim Jógvan við Keldu. Vit hoyrdu landsstýris-mannin í heilsumálum, partamannin hjá Jógvani, verða uppi og siga frá, at upphæddin til Landssjúkrahúsið í Havn lá fast 207 mió.kr. og tað skuldi ikki fara upp um tað. Eg hevði rokna við, at so kom Jógvan við Keldu upp og spurdi, um tað sama var galdandi fyri Klaksvíkar sjúkrahús, men tað gjørdi hann ikki, og tí vil eg spyrja landsstýrismannin í sjúkrahúsmálum, liggur eisini tann upphæddin, hon er skorin nógv niður, fast á 39 mió.kr.? Kunnu teir so ikki fara í gongd við teirri viðgerð av ortopediskum sjúklingum við tí nýggju skurðstovuni, sum teir hava fingið upp og í gongd við øðrum, sum teir hava havt ætlanir um ella, hvat er tað, ið landsstýrið vil skera niður? Vil løgtingsmaðurin hjá Fólkaflokkinum í Norðoyggjum einki siga til hetta, góðtekur hann bara hetta, at Klaksvíkar sjúkrahús verður skorið niður?

Harra formaður. Eg segði fyrru ferð, eg hevði orð-ið, at í staðin fyri, at lagt byrðar oman á fiskimannin og arbeiðsmannin, hann, sum starvast í eksportvinnuni, so áttu hesin at sloppið bíligari í skatti. Tað átti at verðið premierað, tí at tey arbeiða í framleiðslu eksportvinnu
okkara. Teir koma aftur av longum leiðum nú, við stórum trolarum, hava fingið uppí, og teir fáa bara ein part, ein triðing av lønini, teir hava hús og nógv annað at gjalda, men landið fer av stað við øllum hesum.

Eg haldi, at hetta er ikki rætt, eg haldi, at vit áttu at víst teimum tær søndir, at latið teir sloppið bíligari og studlað primervinnuna ikki bara teir, sum skipini eiga, men eisini sjálvan mannin á dekkinum og mannin inni á flakavirkinum og kvinnuna við. Tað hevði

givið øktan eksport og tað hevði eisini givið øktan skatt í landskassan tí, at so hevði vinnan trokt til sín.

Umboð fyri Tjóðveldisflokkin, Hergeir Nielsen og Karin Kjølbro, hava verið her uppi og sagt, at í Føroyum er skattatrýstið ikki so høgt sum í hinum norðanlondum, hetta er als ikki so. Hergeir Nielsen fór undir at nevna tøl fyri nøkur ár, men tá ið hann kom til ár 1987 so steðgaði hann. Tí helt hannfram, so endaði hann við at koma til tíðina í dag, og her er eingin á okkara leiðum, sum rindar, so nógv í skatti og tolli og bundnari uppsparing, sum føroyingurin, tí er tað, at streymurin av fólki er burtur úr Føroyum og fer niður til hini norðurlondini at arbeiða. Í Danmark royna teir, at fáa skattin niður á 50% og í Svøríki royna teir at koma niður á 35%, meðan teir í Føroyum royna at díkja skatt og toll oman á tey, sum skulu arbeiða.

Harra formaður. Tað var Pauli Ellefsen, sum hevur verið her uppi, og nú hevur hann so ásannað tað, at hann hevur sagt skeivt um bundnu uppsparingina, og tað takki eg honum fyri, at hann hevur ásannað, men eg var noyddur at vísa honum á tað, og so reyk hann oman í líkningarráðið at vita um tað passaði, og hann fekk váttan fyri, at tað passaði, sum eg hevði víst honum á og tað takki eg fyri, at hann var her uppi og váttaði. Men hann segði eisini nøkur onnur tøl, nøkur onnur skeiv tøl, tíverri eri eg noyddur at rætta hann eisini har. Hann kom inn á, at síðsta landsstýrið, har eg var ein av teimum, sum sat í landsstýrinum tá, hevði viðtikið útreiðslulógir og gloymt at viðtikið inntøkulógir, og so eg segði hann, at vit høvdu samtykt eina rúgvu av lógum og ikki fingið inntøkur til tað. Also, tað var undirskot hjá okkum øll árini, tað var tað, sum hann vildi siga tingmonnum og Føroya fólki. Men harra
formaður, hetta er jú skeivt.

Eg kann nevna tykkum tølini frá 1986, tá leyp av, tað var yvirskot á fíggjarlógini 256 mió.kr., eg kann fara til 1987, tá var aftur yvirskot 321 mió.kr. og fyri 1988, tað er ikki endaliga uppgjørt enn, men tað verður ikki talan um nakað undirskot men kanska javnvág. Tað

vísir, at hetta er ikki, sum Paull Ellefsen hevur sagt, tað er nakað, sum hevur gjørt tað, vóru eisini útreiðslur fyri til at dekka tær lógirnar, sum vóru viðtiknar. Tað var nakað annað, sum gjørdi tað.

Tað hendi nevnliga tað keðilíga um mánaðarskiftið mars/apríl 1988, at landsstýrissamgongan slítnaði. Tað hendi tað, at tað var lagt fram her í tingirum ein javnstøðulóg, sum vit ikki kundu góðtaka, og tað var komið í tingi eitt uppskot um at broyta borgara-og revsulógina, sum vit heldur ikki kundu góðtaka, og tí fóru vit úr tí samgonguni. Tað varð samgonguslit, og síðan tá hava vit í grundini bara havt forrætningsministerium.

Harra formaður. Framsøgumaðurin Javnaðarfloksins var her uppi. Hann nevndi, at vit teir seinastu mánaðirnir høvdu havt forrætningsministerium, men eg vil siga, at vit hava í seinastu 18 mánaðirnar nevnliga síðan mánaðarskiftið mars/apríl 1988 havt forrætningsministerium, og tí er støðan vorðin so ring, sum hon hevur verið. Landsstýrið, sum sat, tá ið vit fóru út, tað varð sitandi. Teir vildu ikki hava nýval, teir royndu at sleppa sær undan nývali, og teir fóru undir kostnaðarmiklar loysnir fyri at sleppa undan nývali og halda tað heila gangandi. Teir løgdu pengar út her og har, t.d. fyri Skála skipasmiðu. Tað varð til 60 mió.kr. minnist meg rætt, fyri Vágs skipasmiðu varð tað til kanska 20 mió.kr. og nógv annað, bara fyri at halda tað gangandi. Teir fóru uttanlands og læntu fyri fyrstu ferð í skeiðnum hjá tí landsstýrinum og læntu 150 mió.kr. til fiskivinnuna, mínir harrar. Teir brúktu hesar 150 mió.kr. eftir einum eygabrá, og nú varð hetta landsstýrið aftur neytt at koma og læna til fiskivinnuna, og um teir ikki gera nakrar broytingar, sum Petur Reinert eftirlýsti, og tað eftirlýsa vit eisini, so eru hesir pengarnir, sum tit nava goldið í eykauppsparing brúktir heilt skjótt, og ongar broytingar eru gjørdar. Tá skulu teir
aftur út at biðja um nýggjar milliónir, hvar skulu teir tá fara? Tí er tað, at vit eftirlýsa harra løgmaður, harra fiskivinnumálaráðharri, hvat ætla tit at gera? Hvørjar broytingar ætla tit at gera.

Tit standa og háða og spotta Lassa Klein, ti at hann visir á, at vit hava ov nógvar djúpvatnstrolarar, sum bara fiska úr landskassanum. Hetta er so, teir eru ov nógvir. Vit siga ikki, at eingin skal verða, tað skulu verða nakrir, men teir eru ov nógvir. Líka sum vit høvdu ov nógv tarmaskip, og tit lótu øll fara. Vit royndu at torða tí, men øll tóru kortini, vit høvdu eisini ov nógv svartkjaftaskip, vit álaka okkum eisini okkara part av skyldini fyri tað, men tey vóru ov nógv, vit áttu ikki latið øll farið. Í dag eru tað ov nógvir djúpvatnstrolarar, um nesir trolarar, um hesi svartkjaftaskipini ella tarmaskipini høvdu fingið helvtina av tí stuðningi úr landskassanum, sum djúpatnstrolararnir í dag fáa, so gingu teir við stórum yvirskoti allir saman. Vit hava ov nógvar og tað er rætt, sum Lasse Klein sigur, tað eigur at minka, men tað skal fara fram við skili og skynsemi.

Harra formaður. Tað hevur verið førdur ein skeivur fiskivinnupolitikkur frá 1975, og tað er hann, sum vit fáast við at sleppa burtur úr enn í dag. Fiskimaðurin hevur ikki skyldini, men tað er hetta høga ting, og landsstýrið frá 1985-1989, tað royndi at gera nakað við tað, tað skal gamli fiskivinnumálaráðharrin eiga, at hann royndi at gera nakað við tað, men endin slitnaði, tá ið samgongan reyk í mars/apríl 1988, og síðan hevur einki skil verið á, orsakað at eg sigi tað soleiðis.

Harra formaður. Vit hava eitt fíggjarlógaruppskot, og eg kundi hugsað mær at spurt burtur úr hesum um løgtingstíðini. Tað eru 420.000 kr. settar av til løgtingstíðindi, mærvitandi so er einki Løgtingstíðindi komið síðan fyri fyrru helt av 1983, og hvar eru so teir pengarnir farnir. Í 1988 vóru 375.000 kr. settar av til tað, í 1989 vóru 420.000 kr. settar av og einki er komið, tað síðsta kom fyri 3-4 árum síðan, men eg havi spurt skrivstovustjóran í løginginum og hann sigur, at tað verður farið undir at koma við hesum og tað er bara gott. Eg var bangin fyri, at tað var púra steðgað upp.

So hava vit Almannastovuna, hon er lækkað. Eg havi hoyrt fólkafloksmenn tosa um at lækka almannastovuna, men Gud hjálpi mær koma teir og nækka hana og koma við

nýnormeringum á almannastovuni. Fleiri fólk skulu setast á almannastovuni í Havn, meðan tað stendur í álitinum, at úti á bygd var avsett, meðan eg sat sum landsstýrismaður til 5-6 sosilaráðgevarar, men teir eru ikki settir stendur, men tað skulu setast fleiri fólk, eitt ECV fólk og ein stovnserkønur aftrat her í Havn. Hvat sigur ein maður sum Jógvan við Keldu til hetta her, at økja um almannastovuna. Fólkaflokkurin biður um at økja um almannastovuna í Havn, men einki at seta av til almannastovurnar úti á bygd. Tíverri, tað var nógv annað, sum eg kundi vist á m.a. tað, at teir siga, at ferjulegan á Syrðadali skal einki hava, stendur her, og so stendur til seinast her, um heilsuverkið, at teir skulu spara á heilsuverkinum í Havn við at seta fleiri yvirlæknar, ja, tað stendur her, teir skulu spara við at umleggja hjálparlæknastørv til yvirlæknastørv. Eg skilji einki av sparingini hjá landsstýrinum. Kon kanska teir forklára mær tað. Takk fyri.

Hergeir Nielsen (tf.) viðmerking

Harra formaður,

Nú seinasti undantarni røðari endaði við at siga, at hann skilti eini av hesum, sum fór fram í hesum sparingum hjá landsstýrinum. Tað skilji eg so væl, hann hevur flutt navnið hjá sær attureftir á røðaralistanum, síðan vit fóru undir hetta orðaskiftið fyri at kunna brúka alt krútið hjá sær, og tað sær út til at futta væl av, men tað er leyst krút, og tað ansa vit væl eftir.

Fyri at svara upp á tað síðsta fyrst, tað er viðvíkjandi løgtingstíðindum. Seinast eg visti, so fór tað í royk uppi á Dagblaðnum, áðrenn tað var tað Adolf Hansen, sum tók sær av tí, og seinast eg visti um tað, so stóð tað eitt ávist klandur í millum tað prentsniðuna og Kristiliga Fólkaflokkin um maskinur og pengar. Tí er tað kanska av teirri ørsøk, at tað er seinkað so nógv.

Tá ið Niels Pauli Danielsen vísir til, at eg havi pástaðið, at skattatrýstið í Føroyum er væl lægri enn aðra staðir,
so er tað ti, at eg hevið eitt skjal her, sum eitur frá-

greiðing frá Líkningarráð Føroya. Tað er dagtest 25. august 1989 ella fyri einum lítlum mánað síðan, og á síðu 3 í tí skjalinum, sum Niels Pauli Danielsen eisini hevur fingið útbýtt, er ein uppseting frá 1980 fram til 1988 yvir skattatrýst í øllum norðanlondum og londum inni á meginlandinum og har siggja vit tað, at skattatrýstið í Føroyum roknað soleiðis, sum tað er í øllum hinum londunum, alsc samlaður skattur roknaður sum prosent av bruttotjóðarinntøkuni, so siggja vit í tí skjalinum sum bara røkkur aftur til 1987, at skattatrýstið í Føroyum stendur á 45%, í Svøriki á 55%, í Danmark á 52% og í Noregi á 48%. Eg fór ikki víðari, tí eg hevði ikki tøl víðari, Niels Pauli Danielsen fór víðari og pástóð, at Føroyar stóð omanfyri hini londini, hann hevur ongan dokning fyri tí, sum hann segði, heldur ikki í hesum førunum. Men annars skal eg upplýsa Niels Paula Danielsen um tað, at ein av orsøkunum til, at vit hava eitt høgt skattatrýst í landinum, er tann barnastyrkur, sum hann kom við. Hann føddist soleiðis, at Niels Pauli Danielsen fór niðan á almannastovuna friggjadag og segði:"tit skulu hava barnastyrkin klárán til mánadag", tí hann tók eitt annað mál til gisil fyri at fáa hetta málið fram. Tað var ikki gjøgnumarbeitt, tí stóðst ruðuleiki her í tinginum av tí málinum og tí fingu vit táttaðan ein studning til nógvar ríkmannafamiljur her í Føroyum. Soleiðis endaði barnastyrkurin hjá Niels Paula Danielsen, og tí er neyðugt at broyta hann aftur.

Jógvan við Keldu (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var æraði tingmaður Niels Pauli Danielsen. Eftir sum hann tosar, so kundi tað ljóðað, sum eg var ein guvernørur fyri Norðoyggjar, men tað eri eg ikki, men tað stendur mínum hjarta ómetaliga nær og ikki minni Klaksvíkar sjúkrahús, tað stendur øðiliga nær.

Harra formaður. Niels Pauli tosar um, at Klaksvíkar sjúkrahús eisini skal verða við í skerjingini. Sjálvandi skal Klaksvíkar sjúkrahús eisini verða við í

skerjingini, tað er heilt náttúrligt, og eg hevði nú heldur ikki hugsað nakað annað. Tað er ómetaliga týdningarmikið, sum eg havi sagt í mínum fyrru innleggum, at vit allir bera okkara byrðar í sambandi við skerjingarnar. Tað ber ikki til kortini, sum eisini æraði tinglimur Niels Pauli Danielsen, segði eg veit, at hann fer at seta fyrispurning fram, eg havi sæð tað í bløðunum í sambandi við Haraldssund. Hann setur ein fyrispurning fram, hvussu tað ber til, at hetta ikki er farið í gongd. Hann hevur sitið 4 ár í landsstýrinum, at hann ikki fær tað ígjøgnum, tað er nú ikki nakað serliga løgið í ti, tað er oftan man ikki fær alt ígjøgnum, sum man vil, men so nakrar fáar mánðir aftan á at koma og spyrja um, hvussu tað gongur við tí málinum. Tað haldi eg er rokk so langt úti, tað er tað sama við hesum, Niels Pauli Danielsen, ella harra formaður, men tað, sum er har tað, at tað er týdningarmikið, at man er so mikið seriøsur, og tað skuldi Niels Pauli roynt at verið eisini í einum máli sum hesum her.

Niels Pauli Danielsen (kfff.) viðmerking

Harra formaður.

Fyrst vil eg svara Jógvani við Keldu aftur harra formaður. Tað er rætt, at eg havi sett ein fyrispurning um Haraldssund. Tað er soleiðis, at vit settu fyrst 6 mió.kr. av, meðan eg sat í landsstýrinum og síðan 5 mió.kr. til siglingarrennu um Haraldssund, og í fíggjarnevndini var eg við til aftur at seta 3 mió.kr. av. At eg so aftur fari at spyrja, hvat lýður hesum arbeiði, tað er einki løgið. Eg var við til at fáa tað sett av á fíggjarlógini í gjøgnum 3 ár, at eg so nú spyrji eftir tí, tað er einki løgið Jógvan við Keldu.

Fyri tað næsta so er tað heldur einki løgið, at eg spyrji, hvat sigur løgtingsmaðurin fyri Norðuroyggjar til niðurskurðin í Norðuroyggjum. Eg nevndi sjúkrahúsverkið, eg kundi tað sama nevnt tekniska skúla, og eg kundi nevnt studentaskúlan í Norðuroyggjum, eg kundi nevnt handilsskúlan, fiskivinnuskúlan. Streymurin við ungfólki fer inn í Eysturoynna og aðra staðir úr Norður-

oyggjum og Jógvan við Keldu situr mitt í millum og sigur bara "ja, hatta er fint".

Harra formaður. Tað var Hergeir Nielsen, sum kom her upp og hevði eina langa talu og tað var ein viðmerking, skilti eg, men hon liktist eini talu. Hann segði, at eg hevði sitið og bíða til síðstu løtu, og so koyrdi krútið frá mær, men eg skal siga tær eitt, Hergeir Nielsen gjøgnum formannin, tað er tað, at grundin til, at eg ikki fekk orðið fyrr enn nú, tað er tí, at tjóðveldismenn brokaðu meg aftur alla tíðina. Petur Reinert kom her, hann skuldi til ein fund og spurdi, um eg ikki kundi víkja fyri honum. Sjálvandi fór eg ikki at forða honum í at fara á fund, so eg segði, at tú kann fáa mítt plass, og hann fekk tað, tað er grundin til, at eg ikki kom fyrr enn nú.

Síðan kom Hergeir Nielsen eisini inn á barnastyrkin. Nei, Niels Pauli Danielsen hevur ongan tikið til gisla ongantíð. Tað kann vorða, at Hergeir Nielsen kennir nakað til tað at taka gislar, ikki eg. Men tað er ein avtala, sum Niels Pauli Danielsen hevði við m.a. tjóðveldismenninar. Javnaðarmenn hildu sína avtalu í barnastyrkinum, men Tjóðveldisflokkurin leyp frá. saman við Sjálvstýrisflokkinum. Barnastyrkin trúgvi eg ikki, at tit tora at fara og pilka við, eg eri ikki bangin fyri, at tit hava skorið hann niður her. Eg trúgvi ikki, at tit tora at fara og pilka við hann.

Eg fari at takka fakfeløgunum fyri, at tey hava gjørt vart við, at nú skulu tit ansa eftir tykkum. Álvaratos, eg haldi, at fakfeløgini eiga tøkk uppiborna fyri, at tey hava víst á, hvønn týdning barnastyrkurin hevureisini fyri familjurnar, tað vistu vit framman-undan. So eg eri púra róligur har, men eg hevði eitt heilt annað uppskot, sum eg skal koma við, og sum eg fari at tríva í eina ferð seinni. Tá skulu tit siggja, tað er nógv betri enn nakað, lá tit hugsa um.

<u>Atli Dam</u> (jv.)

Harra formaður,

Tað hevur verið talað eitt sindur í seinastuni um

nakað, sum tey kalla privatisering. Tað er eitt ógvuliga týdningarmikið politiskt mál, sum markerar eitt rættiligt týðandi mun í politiskari filosofi, politiskari hugsan og hugsjón, og tá ið teir borgarligu flokkarnir vilja leggja
almenna umsiting fyri hatur sosleiðis, sum vit hoyrdu Jógvan við Keldu gera tað, so brúka teir hetta her við privatisering, tað skal verða so ófært, tað skal verða so nógv effektivari. Júst nú varðv tað aktuelt, og eg vil í og fyri seg rósa tjóðveldismanninum fyri, at tað ikki var satt, sum varð sagt um, at teir eisini har vóru hoknaðir, tá ið tala er um privatisering av lastbilum, strandferðslu o.s.fr. Tað er so bara tann eini skansin, skylji eg, sum teir hava uppgivið Atlantic Airways, og sum eg segði undir hinari viðgerðini
tað var kanska av gálcysni, tí teir ikki hugsaðu seg um og ikki hugsa sum so, at tað var nátúrligt, at eitt útlendskt felag yvirtók henda kappingarneyt. Men eg vil minna tykkum á, at vandin er framvegis stórur, tað verður sera væl gjøgnum framhaldsvirksemi at yvirtaka tað felagið.

Almenn umsiting er nevniliga ikki so ineffektiv, sum tit altíð vilja gera hana til. Í 1973 hevði landsfyrisitingin bríkt 2,5% av allari fíggjarlógini. Í 1974, tá var hetta talið komið niður á 1%. Í dag brúkar Landsskrivstovan 0,5% av fíggjarlógini. Hatta er meira enn, man kann siga um tað, sum hendir í tí privata. Vita tit, hvat tað sokallaða mest effektiva systemið kostar pr. íbúgva nevniliga umsitingin, sum bankarnir hava av hvørjum av okkum sær? 5.000 kr. pr. høvd. Mítt hús kostar also 25.000 kr. bara at verða umsitið við tí lítla, pinkulitla virksemi, eg havi við vanligar bankar. So eg haldi, at tit skulu byrja at hugsa um, hvussu effektivt tað privata er.

Ein av teimum fremstu hermonnunum í hesari herferð, tað plagdi at vera Óli Breckmann, men nú sakni eg hann, hann er sum kunnugt tann allar, allar seinasti stalinisturin, sum er eftir vestan fyri jarntjaldið, hann sigst at vera burturgoymdur nú, fyri at samgongan ikki skuldi skræðna í samband við hesa viðgerðina. Teir

hava sent hann til Suðurafrika ella Madagaskar, eg minnist ikki aftur, Mozambique ja vell.

Nei, tað er nevniliga ikki so, og eg vil har aftur gera kanska serliga tjóðveldismennirnar varðugar við, at tað kann byrja so snikjandi. Tað, sum teir eru her í ferð við at innføra innan fyri heilsuverkið, tað er ein byrjandi privatisering, tað er ein byrjan til sokallað betalingshospital. Havnaarflokkurin vil við hond og fót berjast í móti hesum har, at fólk skulu koma so ólíka fyri, at bert tey, sum hava ráð til at fáa eina laboratoriuviðgerð, skulu fáa hana, og tey, sum bara hava ráð at ganga til ambulanta viðgerð móti betaling, at tey skulu sleppa framat.

Eisini hatta er ein lygn. Í Bretlandi og í USA, hvar tey brúka hetta her systemið við betalingshospitalum, har verður brúkt ein væl størri prosentpartur av samlaðu bruttotjóðarúrtøkuni til hesa somu viðgerðina í mun til, hvat tað kostar her heima hjá okkum, hvar vit hava tað á einum solidariskum grundarlagi, hvar vit øll rinda eftir orku og fáa viðgerð eftir tørvi. So ansi tykkum eitt lítið sindur á hesum økinum, tit kunnu skjótt verða drignir við til nakað, sum tit ikki gáa eftir, er ein sníkjandi stuldur av almennum ognum, ið hvussu so er í tann mun, tað verður burturgivið soleiðis, sum vit hava sæð alt ov nógv uttanlands.

Í Danmark góvu teir teimum privatu eitt felag, sum kallast Kryolitselskabet, har skattaborgarin heilt einfalt góvu hundraðir av milliónum til eitt annað privat felag, sum keypti hetta fyri ein slikk, ið hvussu so er í mun til, hvat tað var vert.

So eg vil sanniliga vóna, at tit megna tað, sum tit lova at tryggja tykkum, at hetta ikki fyri tað fyrsta verður burturgivið og serliga ikki verður burturgivið til útlendingar, tá ið man tosar um hatta flogfelagið.

Eg haldi, at vit skuldu verið menn til at viðgingið vit føroyingar, at vit eru ikki enn nóg dugnaligir. Ikki mala so nógv uttan um bæði í fiskivinnu og framleiðslu og aðrar staðir. Serliga í framleiðsluni, vit hava ikki tað, sum tey rópa management, sum er nóg gott

í mun til aðrar staðir, og hví? Tí vit hava hetta heilt serliga systemið, hvar tað privata einki ansvar hevur, hvar hvørja ferð ein króna manglar í, so kann man bara senda rokningina til landskassan, hvar tað ber til at upparbeiða undirskot í fleiri og tíggju millióna klassanum í høvuðsvinnuni og bara senda rokningina viðari dagin eftir og fáa hana goldna. Men tað er privat, tá ið tað er yvirskot, og avgerðir skulu takast. Tað er har, tann grundleggjandi miseran liggur, og tað er tí, tað nú hevur sovorðnan hast við at fáa unfordeilt nakrar sovorðnar milliónir afturat frá ja, nú kalla tey tað Palleba, yvir til hetta ov vánaliga vinnulívið, at hetta landsstýrið loypir so á loistum.

Jógvan Adolf Johannesen (jv.)

Harra formaður.

Eg skal ikki leingja nógv um hetta orðaskiftið, sum nú hevur verið, men tað ljóðar fantastiskt at hoyra samgonguflokkarnar fúka upp í saman, at tað er Javnaðarflokkurin, sum í dugnaloysi hevur koyrt hetta samfelagið út í óføri.

Sjálvandi er hetta ikki beint, og um so var, at hetta var beint, so mátti hetta verið saman við teimum flokkum, sum vóru í samgongu saman við Javnaðarflokkinum, men hetta er heldur ikki beint.

Sannleikin er tann, at tað er Javnaðarflokkurin saman við teimum flokkum, sum hava verið í samgongu við honum í skiftandi landsstýrum, hevur stýrt hesum samfelagi úr armóðini og fram í vælferðina, sum vit hava í dag. Tað er heldur ikki beint, at Javnaðarflokkurin skulkaði sær undan ábyrgd fyri heldur at seta met í andstøðu uttan ábyrgd. Nú haldi eg heldur ikki, at tað er beint, at andstøðan onga ábyrgd hevur av samfelagnum, sjálvandi hevur andstøðan eisini ábyrgd. Tí royna vit eisini at gera vart við ymiskt, sum kundi verið betri, og tala at ymiskum, sum vit halda er skeivt. Annað er, at vit sjálvandi ikki tora at taka ábyrgd av gerðunum hjá øðrum. Jú, sanniliga torir Javnaðarflokkurin at taka og tekur eisini fulla ábyrgd av teimum gerðum, sum hann hevur gjørt.

Eg ætli mær sjálvandi ikki at gera hvítt til svart og øvugt. Nei, eg ætli mær í andstøðu at verða positivur í viðgerðini av teimum gerðum, sum eru positivar fyri land og tjóð. Men eg ætli mær sjálvandi heldur ikki at sita tigandi og samtykkja, hóast eg sjálvandi veit, at landsstýrissamgonguni ger tað sama, um andstøðan samtykkir ella ikki. At sita og tiga í teimum avgerðum, sum virka negativar fyri fólkið sum heild, sum sagt, eg ætli mær at verða positivur, har gerðirnar eru positivar.

Álvara tos, eg haldi, at Tjóðveldisflokkurin hevur misskilt okkurt. Eg vil kortini ikki illgita teir fyri at misskilja við vilja, men um tit fylgja við orðaskiftinum, so eru tað ikki javnaðarmenn, sum eru grammastir at leypa á Tjóðveldisflokkin, nei, tað eru tykkara núverandi samgongumenn. Sjálvandi undrar tað meg eisini stórliga, at tjóðveldismenn, sum saman við Javnaðarflokkinum hava sitið við ábyrgdini seinasta valskeiðið og tískil hava bæði rós og ris uppiborið fyri tað, sum fram er farið í hesum tíðarskeiði, tigandi taka í móti køyrlinum, sum verður sveiggjaður yvir ryggin á teimum av teirra núverandi samgongumonnum. Men teir um tað.

Tí var tað so ómetaliga beinrakið og fjálgandi at hoyra háttvirdu landsstýriskvinnu Jórgerð Purkhús, sum eg veit, er eitt skilafólk og sum hevði fíggjarmál um hendi í fyrrverandi samgongu, tala "Roma midt imod" og siga, at svartskygnið hjá núverandi samgongu, ella nakað soleiðis málbar hon seg, er farið um mark, tí at støðan hóast alt ikki er so vánalig, sum sagt verður. Væl talað, og tað er sanniliga fyri neyðini at siga Føroya fólki eisini frá tjóðveldinum, at støðan ikki er so út av lagi ring kortini.

Men tí verri sjálvandi ber tað til at gera støðuna verri enn, hon er, hjá summum er einki ómøguligt, men gagnligt fyri tjóðina er hetta óhugnaliga svartskygnið ikki. Eg havi annars aldri varnast, at tjóðveldismenn hava størri álit á landi og fólki enn javnaðarmenn.

Tað, sum eg veit, hava javnaðarmenn fult so stórt álit á tí fólki, sum her býr, sum teir, og tað eru ikki javnaðarmenn, sum fremst í hesum døgum ganga og mála bílætið so svart, sum gjørt verður. Takk fyri.

Eilif Samuelsen (sb)

Kærra formaður.

Eg hevur verið nevnt um Løgtingstíðindi, at tað ikki er komið nú í nógv ár. Tað kann sjálvandi verða eitt sindur uttanhandað, at tað er ikki komið, men teir, sum skulu brúka Løgtingstíðindi, eru stórt sæð bara tingmenn, so tað er avmarkað, hvussu stórur skaði, tað er.

Nakað annað er við kunngerðum av lógum. Vit hava her í hesum orðaskiftinum havt nógv tos um lógina um bundna uppsparing, og tá ið vit hava sæð, hvussu lítið ið tingmenn eru inni í, hvat ið stendur í lógini, hvussu skal tað tá verða við ti vanliga fólkinum, sum skal brúka hesar lógirnar?

Fyrr var tað soleiðis, at allar lógir vórðu lýstar í Dimmalætting og hon kemur væl út í eini 12.000 hús í Føroyum. Sambandsflokkurin hevði uppskot um, at tað skuldi lýsast í øllum bløðum, men undanfarna samgonga samtykti, at nú skuldi tað bara lýsast í Kunngerðablaðnum, og Kunngerðablaðið kemur út í nøkrum fáum hundrað eintøkum. So at vanlig fólk hava stórt sæð ongan møguleika fyri at kunna seg um, hvat ið stendur í lógunum í praksis, og tað er ein ógvuliga vánalig service, tað má man siga.

Eg skal annars nýta hesar seinastu stuttu minuttírnar til at siga nøkur fá orð um skúlamál.

Tað er ilt at taka dagar ímillum, hvørjar kontoir á fíggjarlógini, ið tilla tola at verða skornar niður og hvørjar, ið tola tað betur. Í hesum føri hevur tað ikki verið nakað val. Høvuðsreglan hevur verið, at allar kontoir mugu verða minkaðar so nógv, sum til ber uttan, at tað gongur alt ov mikið út yvir ta funktiónina, sum tann einstaki stovnurin hevur at reka.

Eg eri samdur við teimum, sum siga, at í ringum tíðum skal ein tjóð vísa sína styrki við at menna undirvísing, útbúgving og mentan. Tí tað er einans í gjøgnum vitan, kunnleika, skapanarevni og nýhugsan, at vinnast kann burtur úr teimum trupulleikum, vit í hesum tíðum

eru í.

Málgagnið hjá Javnaðarflokkinum hevur hesa seinastu tíðina drivið eina systematiska herferð í móti teimum atgerðum, sum hetta landsstýrið hevur sett í verk fyri at bjarga tí føroyska búskapinum upp aftur á føtur. Eingin skuldu tráð, at tað var júst Javnaðarflokkurin, ið fyri góðum hálvum ári síðani rímdi av tí søkkandi skútuni, sum er høvuðsatvoldin til, at vit nú vóru í ferð við at renna okkum inn í eina tá ringastu kreppuna síðani kriggið. Men teir látast, sum teir einki hava havt við alt hetta at gera. Tað má sigast, at teir eru ikki lítið framførir.

Sosialurin hevur m.a. ført fram, at fólkaskúlin skal verða so illa fyri av sparitiltøkunum, at 94 lærarar skulu sigast úr starvi. Hetta er sjálvandi heilt burturvið. Veruleikin er tann, at fólkaskúlin, sum kostar 168 mió.kr., skal spara tilsamans 4 mió.kr, ella 2,3% í mun til seinasta ár.

Landsskúlastjórin sigur í viðtalu við 14. september, at honda sparingin fer ikki at føra við sær, at tað verður neyðugt hjá nøkrum lærara at frykta fyri starvinum, tí sparingarnar verða gjøgnumførdar aðrastaðni. Saman um tikið heldur landsskúlastjórin, at tær ætlaðu sparingarnar eru rímiligar, og at tað fer at bera til at hava eina forsvarliga undirvísing við tí peningi, sum er til taks.

Um hugt verður at rakstrinum av øllum skúlaverkinum hesi seinastu árini, vísir roknskapurin, at í fjør kostaði skúlaverkið 290 mió.kr., í ár eru settar av 305 mió.kr. og komandi ár hevur landsstýrið skotið upp at seta 304 mió.kr. av til skúlaverkið. Landsskúlastjórin heldur, at hóast lønarvøkstur upp á nøkur fá prosent, so fer tað at bera til at hava eina forsvarliga undirvísing fyri hesa avsettu peningarøgdina.

Fólkaskúlin fer sum nógv tann størsti skúlin avstað við tí størstu upphæddini á hesi greinini. Hyggja vit at hinum skúlunum, síggja vit, at teir fáa tlest allir tá somu upphæddina komandi ár sum fyri inniverandi ár. Hetta er ein ávís sparing eftir sum teir flestu hava hava havt eina javna hækking frá ári til árs. Fyri teir

eldru skúlarnar, sum eru komnir inn í eina javna gongd, man hetta ikki fara at konnast so tungt, men tað er záðvísi fyri teir nýggju, sum ikki enn eru komnir inn í ein fastan form, men enn eru undir uppbygging. Her kunnu vit nevnd musikkskúlarnar.

Fyri at kunna geva eina undirvísing í øllum partum av landinum, har sum teir instrumentbólkar eru við, so má eitt minsta mark av undirvísarum til. Musikkskúlarnir runt um í landinum hava hesi seinastu árini ment seg soleiðis, at teir nú kunnu samarbeiða um at hava smærri orkestur, og tað er jú eitt av endamálunum við undirvísingini og gevur henni eisini veruliga meining.

Har aftrat hava vit nú fingið tað landsumfatandi Føroya symfoniorkestur, sum eitt annað úrslit av tí víðkaðu musikkundirvísingini.

Tann nýggi skúlin fyri tiskiidnað og navbúnað er eitt annað dømi um ein stovn, sum er undir uppbygging, og sum krevur eina nokk so rúmliga játtan, skal hann fáa eina góða byrjan.

Føroya handilsskúli hevur fingið eina hækking upp á 3 mió.kr. Hetta er orsakað av, at tann nýggja deildin hjá handilsskúlanum á Kambsdali er farin undir undirvísing nú í nýggja skúlaárinum. Tað er bara spell, at byggingin av skúlanum skal verða so nógv seinkað, at ivasamt er, um farið verður í nýggju húsini í hesum árinum.

Í Føroyum vísir tað seg, at seinkingar í bygging er ein høvuðsregla, meðan tað er eitt rárt undantak, at byggingar verður lidnar til tíðina. Her má vera nakað rívandi galið, og hetta má okkurt kunna verða gjørt við.

Landsmiðstøðin fyri undirvísingaramboð fer nú endiliga eftir tøgvið stríð við politisku myndugleikarnar undir sítt virki av álvara. Í hesum døgum verður flutt inn í nýggju hølini á Hoyvíksvegnum, og umstøðurnar skuldu verðið góðar til, at miðstøðin kann fara at gerast ein eyggjandi og nýskapandi hjálparstovnur hjá øllum tí føroyska skúlaverkinum.

Frítíðarundirvísingin fær 2 mió.kr. minni á uppskotinum enn í ár niverandi ári. Henda undirvísingin má saman við musikkundirvísingini, ítróttinum og øðrum fri-

tíðarvirksemi metast at vera sera týðandi táttur í strembanini eftir at útvega serliga ungdóminum møguleikar fyri at nýta fritíðina á ein positivan og skilagóðan hátt.

Tí má tað sigast at vera harmiligt við hesari skerjing, men eg ivist ikki í, at ein ávís rationalisering og stramming av umsitingini av lógini ikki fer at nerva sjálva undirvísingina nevnivert.

Grunnurin til útbúgving tær avsettar 5 mió.kr. minni enn í ár. Ein av broytingunum er, at næminga, sum ganga í fólkaskúlanum ikki longur fáa almennan studning aftur at tí, at teir fáa ókeypis undirvísing. Men forheldur at teimum næmingum serliga í útoyggjum, sum ikki kunnu fáa framnaldsundirvísing í heimbygdini, men mugu flyta bústað, fáa framvegis stuðul eftir fólkaskúlalógini fyri tær meirútreiðslur, sum foreldrini hava av, at børnini mugu hava innivist í skúlabygdini.

Í samgongusjalinum er ásett, at studentaskúlin í Eysturoynni skal byggjast í samband við handilsskúlan á Kambsdali. Lógaruppskot um hetta varð lagt fyri tingið í gjár, og samtykt er, at projekteringin skal verða gjørd beinanvegin, meðan sjálv byggingin sambært raðfestingina av íløgum ikki byrjar fyrr enn í 1991.

Á figgjarlógini eru avsettar 6 mió.kr. í grunn, og avsettar eru nú hesi árini tilsamans 19 mió.kr. til hesa byggingina. Nógv nevur verið kjakast millum ár og dag um hesa bygging til óbótaligan skaða fyri skúlan og teir næmingar, sum har hava gingið og ganga, men vónandi verður ein endalig loysn framd undir hesum landsstýrinum, og tað skuldu eisini verðið góðir møguleikar fyri tí, tí her eru eingir flokkar uppí, sum einans hugsa um at mjølva sína egnu flokskøku og ikki vísa minsta atlit til, hvat tað tænir samfelagnum til besta.

Lasse Klein (sj)

Harra formaður.

Eg trúgvi, at háttvirdi tingmaðurin Eilif Samuelsen má hava misskilt okkurt, tá tað hann kann framføra síni sjónarmið soleiðis, sum hann ger í samband við tað,

sum teir kalla teir smáu flokkarnar, tí at munurin millum teir flokkarnar er ikki so stórur í mun til Sambandsflokkin, um vit leggja flokkarnar saman, so eg haldi, at Eilif nýtist ikki at spekreka á ein slíkan hátt, sum hann ger.

Tá ið hann nevnir skúlamálini, tað frangongur klárt og týðuliga, at skal virksemið halda fram viðvíkjandi fólkaskúlanum í mun til tað, sum tað gjørdi bæði í 1988 og í 1989, so er neyðugt, at fólkaskúlin fær eina upphædd upp á 178,6 mió.kr., og uppskotið hjá samgonguni er 168,5 mió.kr., t.v.s. eina minni inntøku upp á 10 mió. kr., og tí svarar tað eisini til tær skerðingar í starvsfólkatalinum, ið talan er um her, tí Eilif Samuelsen veit væl tað, at ið hvussu er meira enn 80% av allari hesari upphæddini er løntalsins. So har er einki annað at gera uttan at sparingin fer fram í samband við at siga fólk úr starvi.

Tað er eingin ivi um, tá ið talan er um almannamálini, at ávísar umprioriteringar eiga at fara fram, tá ið talan er almannamál, og tað er heldur einki at siga til, at áhugin fyri almannamálum er stórur. Talan er um størstu einstøku upphæddina til eina grein, almannamálini fara nevnliga avstað við 820 mió.kr. ella í millum 26 og 27% av samlaðu landskassans útreiðslum.

Tað hevur verið greitt frá, at almannaverkið fær nærum somu upphædd sum undanfarnu ár. Hetta er sjálvsagt ikki rætt, tí samgongan hevur við vilja ikki tikið upphæddir við, sum framman undan hava verið lógbundnar. Her kann eg vísa á, at tann serviðbótin, sum er til pensionistar, sum varð innført í fjør, hon er torpederað, hon er ikki við í hesum her, har fólkapensionistar kundu vinna skattafrítt upp til 50.000 kr. uttan at fáa skatt, t.v.s. aftur at tí lítlu fólkapensiónini, teir fingu. Henda upphæddin er strokin uttan nakrar sum helst viðmerkingar frá samgonguni yvirhøvur.

Hetta sær út til at vera ein tann fyrsta takkarløtin, sum hendan samgongan veitir fólkapensionistunum.

Nú er tíðin við at líða, so at eg skal bara gera nakrar heilt stuttar viðmerkingar aftaná.

Samgongan og samgongumenn hava dúgliga roynt at

sannført fólk um, at tey fara at fáa hesa burdnu, tvungnu uppsparingina aftur. Eg má siga tað, at eg eri ikki so sjartskygdur, reknt ikki við, at samgongan fer at halda orð í hesum sambandi, tí tá ið vit vita, hvussu ið tilvildarligt lóggávuarbeiðið her á Føroya løgtingi hevur verið hey seinnu árini, so hava vit onga tryggd fyri, at tað fer at halda. Tað er ikki meira enn 1½ ár síðani, at barnastyrkurin varð innførdur, nú tosar man um rættiliga stórar skerjingar, nú skal lógin broytast, og henda her serviðbótin til pensionistar, varð innførd fyri einum ári síðani, hon skal avtakast nú aftur. T.d. studentaskúlin broyta heimstað frá Gøtudali til Kambsdal. Tann samhaldsfasta ettiriønin skal eisini broytast. Ambulansatænastan, sum varð innførd fyrr í ár í Eysturoynni, hon skal nú aftur broytast. Vit hava onga vissu fyri, at fólk yvirhøvur fær hesar pengarnar aftur, og tað kunnu vit m.a. byggja á hetta tilvildarliga lóggávuarbeiðið, sum fer fram her á Føroya løgtingi.

Tað er kortini mín vón, at fólk hevur møguleika at fáa hesar pengarnar aftur, men solciðis, sum viðurskiftini eru, havi onga tiltrúgv til tess.

Løgmaður viðmerking

Harra formaður.

Tað var viðvíkjandi hasum spurninginum um ta upphæddina, sum stóð á fíggjarlógini í samband við, at pensionistar skuldu kunna tjena 50.000 kr., áðrenn viðbøturnar minkaðu. Tað er rætt, at handa upphæddin er strokin, hon er strokin, tí tað er ætlað at koma við eini broyttari lóggávu á hasum økinum, so handa lógin verður avtikin, og í staðin verður innførd ein lóg um, at fólkapensiónsgrunduppheddin verður skattafrí soleiðis, at fólkapensionistar ella pensionistar í heila tikið kunnu tjena fólkapensionistaupphæddina, áðrenn tað verður byrjað at rinda skatt.

Eilif Samuelsen (sb) viðmerking

Harra formaður.

Seinasti talari Lasse Klein segði, at tað vóru eingir aðrir møguleikar enn at siga fólk úr starvi, tá ið fólkaskúlin varð skorin niður við hesum 4 mió.kr. Jú, tað eru aðrir møguleikar.

Landsskúlastjórin hevur sagt, at tað tað verður eingi fólk uppsagt, men at sparingarnar skulu fremjast aðrastaðni.

Soleiðis er tað óivað á nógvum, nógvum øðrum stovnum, eisini á sjúkrahúsverkinum og aðra staðni, tað er ikki givið, at tað er neyðugt at siga nøkrum fólki upp, tað eru nógvir, nógvir aðrir møguleikar at spara upp á, og tað skal nokk vísa seg áðrenn hetta árið er úti, at so hava teir funnið upp á nógva aðrar møguleikar at spara upp á.

Lasse Klein nevndi hesa bundnu uppsparingina og sigur tað, at hon verður ikki útgoldin aftur. Nú kann tað gott verða tað, at hinir flokkarnir ganga í tí trúgv, at hetta ongantíð verður útgoldið aftur. Men Sambandsflokkurin gongur sjálvandi inn fyri, at henda bundna uppsparingin verður útgoldin, tá ið hon skal, men tað er tá klárt, at tað er treytað av, at Sambandsflokkurin verður nóg sterkur til ta tíð at gjalda hesa bundnu uppsparingina útaftur. Hann kann ikki gera tað einsamallur, uttan at hann er so mikið sterkur, men so kunnu vit eisini lova øllum Føroya fólki, sum hava goldið hesar pengarnar, at tá fáa tey hesar pengarnar aftur.

Lasse Klein (sj) viðmerking

Harra formaður.

Fyrst var tað háttvirdi løgmaður Jógvan Sundstein, sum tosaði um serviðbótina hjá fólkapensionistum. Eg haldi hann avdúkaði tað, sum samgongan hevur ætlanir um og at hon hevur ikki tikið hædd fyri nakra broyting á hasum økinum. Vit mugu bara konstatera tað, sum Pauli Ellefsen, formaður sambandsfloksins, hevur sagt, at tað skulu fremjast størri sparingar. So tað er heilt skilligt, at tað er á ongan hátt ætlanin, at lata fólkapensionistar fáa nakra sum helst serviðbót av nøkrum slag.

Harra formaður. Nú tosar Eilif Samuelsen, hátt-virdi tingmaður, um, at tað ber saktans til at finna sparingar innan fyri kontoina hjá fólkaskúlanum. Her hugsi eg, at Eilif Samuelsen fer skeivur, tí 80% av tí upphæddini, sum er til fólkaskúlan, er júst lønir. So har er ikki meira at spara uttan so, at tað verða nøkur størv spard burtur, og tað má væl verða tann sparingin, sum Eilif Samuelsen vísir á. Eg skilji nú, at óvissan um ta bundnu tvungnu uppsparingina, at hon skal gjaldast aftur, hon er er rættiliga stór, og tað havi eg notera mær, so at vit hava onga trygd fyri, at handa upphæddin yvirhøvur verður útgoldin soleiðis, sum samgongan hevur fráboðað.

Pauli Ellefsen. (sb)

Harra formaður.

Nú gangi eg bara út frá, at orðaskiftið um tíggjarlógina 1990 og løgmansrøðuna 1989 er um at vera liðugt, og tikið sum um politiskt orðaskifti er tað mín metan, at hetta er tað minst áhugaverda orðaskiftið og keðiligasta, síðan eg kom á ting. Ein orsøkin er sjálvandi tann, at vit ikki hava nakra veruliga andstøðu, at vit ikki fáa ávíst alternativ til tað, ið vit sjálvir leggja fram, men tað kemur nakað annað aftrat, meiri grundleggjandi, tað er tað, at politiski tónin og orðaskifti í Føroyum er fullkomiliga broytt í mun til fyri 10-15 árum síðani. Eg hálði at innleggið hjá Petur Reinert gav týðiliga ta innstilling, sum er í Føroyum í dag, og sum hevur gingið ígjøgnum nógv av innleggunum frá øðrum flokkum her á tingi.

Tey fyrstu 5-10 árini, eg sat á tingi frá 1974 og aftaná, hetta var aftan á, at sambandsflokkurin hevði sitið í landsstýrinum í nógv ár, havt fíggjarmál um hendi, ein tíð hvar okkara samfelag var sera væl konsoliderað, var sera væl fyri, tá fingu vit í hvørjum einasta orðaskifti, í hvørjum blaði at vita, at sambandsflokkurin átti einki av øllum hesum her. Vit høvdu ongantíð komið við nøkrum hugskoti, vóru drignir

aftan á hinar, og tað varð tosað um mangt og hvat.

Nú er tónin heilt annar, nú Føroyar fyri aðru ferð í 10 ár er koyrdar fíggjarligar fastar, nú hoyra vit tíðliga og seint, ikki tað at vit ikki eiga lut í hesum her, tvørturímóti, tað verður undirstrikað av øllum, men vit eru allir líka góðir, fáa allir líka stóra skyld í hesum her. Petur Reinert var her uppi. Minst til, vit eiga allir skyld av hesum her, og, sigur hann, vit hava allir skyldu til at loysa trupulleikarnar. Tað seinasta eri eg fullkomiliga samdur við honum í, og tað er tí, vit eru farnir í hetta landsstýrið. At vit ætla okkum og hava átikið okkum at vera við til at loysa trupulleikarnar. Hesir trupulleikar høvdu ikki verið til staðar, um sambandsflokkurin slapp at halda fram aftan á 1974. Í valskeiðinum 1980 - 84 kann tað skjalprógvast, at afturgongdin hevði verið umleið 3 mia. kr. - orsaka, tað var í valskeiðinum 1984-88, at afturgongdin hevði verið minst 3 mió. kr. minni, um sambandsflokkurin hevði rátt.

Fíggjarlógin fyri 1990, sum er viðgjørd her, hevði sæð heilt og aldeilis annarsleiðis út, um tað var sambandsflokkurin, sum hevði rikið politikk í Føroyum, tann politikk, sum Atli Dam kallaði: "gamlan sambands-politikk". Tá kundu vit lækka skatt, og vit kundu óivað eisini lækka toll. Eg eri fullkomiliga ósamdur bæði við Petur Reinert og øllum øðrum um, at vit eiga líka nógva ábyrgd av tí, sum er farið fram, sum aðrir, skeiva vegin í Føroyum, fullkomiliga ósamdur, og tað veit fólkið væl. Harafturímóti eri eg samdur við honum, at vit hava skyldu til, kanska meiri enn nakar annar við teirri stevnuskrá og vit teirri søgu, sum flokkurin hevur, kanska meiri enn nakar annar, til at loysa teir trupul-leikar, sum eru, og tað er tað, sum vit vilja gera.

Harra formaður. Tað var Atli Dam, sum hevði eitt rímmar innlegg um privatisering, og serliga tá í 70'unum, tá var Atli Dam ofta her uppi og líkasum við ryggirnum í móti múrinum segði: "Nei, nei, nei, tað passar yvirhøvur ikki, vit eru ikki líka so sosialistiskir sum russarar. Ment tað er ein sannroynd, at í dag, eiga russarar, polakkar, kinverjar, jugoslavar og allir eystanfyri vit mugu privatisera, vit hava spælt

fallit við okkara almenna virksemi, vit mugu privatisera, og vit mugu hava menn vestanífrá, monn og kvinnur vestanífrá kapitalistiskum londum til at leggja okkum lag á soleiðis, at vit kunnu privatisera.

Í dag er Atli Dam nógv meiri sosialistiskur enn russarar og kinesarar, og hvør er tann seinasti stalinisturin í Føroyum, Óli Breckmann ella Atli Dam, tað skal eg nú ikki leggja meg útí.

So var tað Lasse Klein, sum aftur var her og mótmælti at útgjalda tá bundnu uppsparingina aftur. Allir flokkar hava verið her uppi og sagt: "Hetta her, hetta verður ongantíð endurgoldið, hetta er skattur".

Vit í sambandsflokkinum eru teir einastu, sum ikki vildu ganga við til eykaskattin, vit eru teir einastu sum tvíhalda um, at hetta her er uppsparing, og hetta skal gjaldast aftur, hvørt oyra, við rentu, skattafríari rentu, svarandi til longstu innlánsbók, hetta skal gjaldast hvørjum einstøkum borgara aftur, men leggið til merkis, tann einasti flokkurin, ið sigur hetta her, tað er sambandsflokkurin. Og tað gangi eg út frá, at tað er gingið upp fyri fólki, at skulu teir hava hendan peningin, tey fáa hann eisini. Nú er tað eisini neyðugt at styrkja um sambandsflokkin, men lat tað fara, tað er góð tíð til tað, vit koma aftur til tað fyri val, og tað verður ikki enn. Ja harra formaður, tíðin er farin, og eg skal eisini halda uppat.

Tordur Niclasen viðmerking.

Harra formaður.

Pauli Ellefsen hevur nú fleiri ferðir roynt at billa fólki inn, at hasar inntøkulógirnar, tann sokallaða bundna uppsparingin einki hevur við skatt at gera. Hatta kann hann kalla, hvat hann vil, men hatta er ein eykaskattarokning, sum er send út til føroyska skattgjaldaran, og ikki bara tann vanliga, sum hevur eina inntøka omanfyri 200.000 kr., men heilt til teirra, sum hava eina inntøku yvir 110.000 kr., og nú kemur hann upp og sigur, at hesin peningur fer at vera útgoldin aftur, tað stendur jú í lógini, og tað í sær sjálvum, harra

formaður, skapar iva um hetta her, um hesin peningur í heila tikið verður út aftur goldin. Meiri trygd hava vit ikki, tí tað er alt annað enn hugsandi, at sambandsflokkurin fer at vaksa, aftaná at hann so dyggiliga hevur sveiggjað við pískinum yvir tann vanliga løgmóttakaran.

Løgmaður viðmerking.

Harra formaður.

Nú er tað soleiðis, at tingmenn ofta við vilja eru eitt sindur tornæmir, men viðurskiftini eru so, at tann uppsparingin, sum verður kravd upp í 1989, fer inn í landskassan, og hon verður sambært lógini út aftur goldin 1 1992. 1. juli 1992, verður hon sett inn á navngivna konto hjá hvørjum einasta persóni, sum hevur goldið hana inn.

1990 og frameftir verður peningurin ikki uppkravdur til landskassan, hann verður settur inn á konto hjá øllum teim persónum, sum gjalda inn. Tað er rætt, at av praktiskum orsøkum verður tað fyrst sett inn á eina samlikonto, men alsamt til hægstu bankarentu, t.v.s. alt verður forrentað, øll specifikatiónin finst í skattasysteminum í edv-systeminum, hvør ið hevur goldið, og so verður upphæddin flutt yvir til tað persónligu kontoina í peningastovninum hjá viðkomandi persóni, so tað er í og fyri seg ikki talan um at afturgjalda, peningurin er ongantið tikin, hann stendur alla tíðina á konto hjá viðkomandi persóni í einum føroyskum peningsstovni.

Skal tað vera soleiðis, at peningurin skal takast frá fólki, so skal gerast ein nýggj lóg, sum konfiskerar hendan pening, og tað verður ikki gjørt. Tað, sum er, er at hesin peningurin sambært lóg verður inngoldin á eina konto í føroyskum peningsstovni hjá viðkomandi persóni, í hansara egna navni og er hansara egna eign. Hann kann bara ikki disponera yvir peninginum tey fyrstu fýra árini.

Niels Pauli Danielsen (kfff.)

Harra formaður.

Tað er neyðugt enn eina ferð at minna háttvirda tinglim. Pauli Ellefsen, á, at tann bundna uppsparingin hon er ikki so sum hann hevur sagt. Hann stóð her og segði, harra formaður, at peningurin fer ikki í landskassan, hann fer inn á eina bók í navninum hjá hvørjum einstøkum.
Lat meg sláa fast eina ferð aftrat, líkningarráðið hevur í dag upplýst meg um, at hatta passara ikki. Tað fer ikki inn á bók hjá hvørjum einstøkum. Tað verður kravt inn saman við samtíðarskattinum og kann tekniskt ikki skiljast frá honum, og tí fer tað í løtuni saman í landskassan, og so við ársenda, 31. december, kann tað gerast upp, tí tá veit man, hvat skal vera hvat, og hvør inntøkan er. Tá verður tað skilt sundur, og tað verður bókað ikki í navninum hjá hvørjum einstøkum, men í eina samlaða bók, sum eitur Føroya fólk. Eins og Føroya Fólks Songbók.

Pauli Ellefsen (sb)

Harra formaður.

Tann samgongan, sum Niels Pauli Danielsen sat í, brúkti Føroya Fólks Songbók, tað sóu vit í sjónvarpi og øðrum, og her er rætt, men man kann kalla bókina, hvat man vil, men tað er eitt heilt annað slag av bók, tað veit eg, tað, sum ger føroyingin ivasaman, er júst tað, at Niels Pauli Danielsen, Tordur, Lasse Klein, Atli Dam og allir teir siga: "Tvætl, tit fáa aldri allan hendan pening aftur!"

Peningur, sum løgmaður sigur, sum sambært lóg skal gjaldast ella als ikki takast, og tí er tað, eg sigi, at um eg var ein og hvør, líkamikið hvar eg búði í Føroyum, so hevði eg sagt: "O.k., eg eri við til at loysa hesar trupulleikarnar, eg eri við til at binda nakað av peningi, sum eg eigi sjálvur, og hvør kann skaffa mær teir aftur, ja, teir, sum ganga inn fyri, at tit fáa hann aftur. Tað er bara sambandsflokkurin. Ja, løgmaður er samdur beint nú, men sjálvt løgmaður var við til saman við tykkum at skjóta upp fyrst eykaskatt, tað byrjaði

við eykaskatti, men vit broyttu eykaskattin til bundna uppsparing, og Tordur Niclasen heldur á við at kalla hana fyri eykaskatt. Eg eri í grundini fullkomiliga líka glaður, hvussu tit doypa barnið, nær sagt, men tað veruliga er tað, at um veljarin skal hava hendan peningin aftur sum bundna uppsparing, og tað skal hann sambært galdandi lóg og eftir ætlan hjá sambandsflokkinum, so er hann næstan noyddur til at konkludera: "Vit mugu heldur tryggja okkum, at vit fáa hann aftur við at stuðla sambandsflokkinum." Men tað skulu tit ikki gera fyrrenn til valið.

Flemming Mikkelsen (sb)

Harra formaður.

Nú hevur hetta orðaskiftið skjótt vart í tveir dagar, og tað hevur til tíðir verið áhugavert at lurta eftir hesum orðaskiftinum. Her hevur verið nógv at tríva í.

Hetta er fyrsta fíggjarlógaruppskotið undir hesum nýggja landsstýrinum, og hetta er eisini fyrsta løgmansrøðan hjá verandi løgmanni. Her hava verið tøl at tosa um, og her hava verið ætlanir um, hvussu sitandi landsstýrið vónar at sleppa okkum burtur úr hesum her so heilskapað sum møguligt, burtur úr hesum fíggjarliga óførinum um undanfarna landsstýrið saman við t.d. Niels Paula Danielsen hevur ført hetta neyðars land út í. Serliga grovt hevur malið tey 2 3 seinastu árini, har fíggjarlógin er vaksin við 100-tals milliónum, meðan okkara útflutningsvirði, fundamentið undir hesum samfelagnum hevur staðið í stað, men nú sær út til, at vend er komin í. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Ivan Johannesen, hevur í hesum uppskotinum lagt upp til at minka nakað um útreiðslurnar á teim ymisku økjunum, meðan fiskivinnukontoin hevur fingið nakað aftrat. Men hóast alt, so er talan um ein niðurskurð. Hetta her verður átalað av teimum, sum umsita hesi ávísu økini.

Vit hoyra t.d., at skúlaverkið kemur ikki at hanga saman, vit hoyra um, at sjúkrahúsverkið væntar, at biðirøðirnar verða longri, og vit hoyra um lands-

verkfrøðingsstovnin, sum kemur at minka munandi um arbeiðsfólk o.s.fr., men harra formaður, tað er teirra rættur, alt annað vildi verið øvugt ella ónatúrligt. Men tí verri, vit eru í teirri støðu, at vit orka ikki at bera hesar uppgávurnar á tí støði ella við tí skipan, koyrt verður við.

Inntøkugrundarlagið er beint fram ikki til staðar. Vit mugu finna fram til øktar, helst aðrar inntøkumøguleikar enn, um vit skulu halda plass. Okkara fiskigrunnar bera ikki hetta samfelag, sum tað sær út í dag, og vit hava ongan møguleika at framleiða okkum burtur úr hesi her støðu vegna ávørutrot. Tað er ómøguligt, at vit skulu kunna góðska okkara vørur fyri ein søluprís, sum liggur á einum hægra støði, men tað verður ikki tann munur, at tað ber øllum uppi, tíverri. Hesum mugu vit so liva við, annaðhvørt vit vilja ella ikki. Men tað er eingin grund til at leggja árarnar inn, vit mugu heldur taka tær trongu tíðirnar sum eina avbjóðing, tí at av sær sjálvum kemur einki. Vit hava havt nøkur sokallað góð ár, men ein hevur kortini havt verhugan av, at alt hevur ikki ruggað rætt. Virksemið í summum pørtum av landinum hevur verið øgiligt, so nógv, at hópur av fremmandum fólki hevur starvast her á landi í longri tíð. Skeivleikin í hesum er, at meginparturin av øllum hesum virkseminum ikki hevur økt um framleiðsluvirðið, og sostatt ikki um útflutningsvirðið, heldur øvugt.

Nú krubban er tóm, nú bítast hestarnir, sum orðatakið sigur, tað verður sparkað í allar ættir, men sjáldan man nakað landsstýri vera komið til ein so tóman kassa sum hesa ferð. Eg trúgvi ikki, at nakað landsstýri ella nøkur samgonga er komin í tingið við inntøkulógum fyri stuttleika skyld. Tað er neyðugt fyri, at landskassin kann gjalda tey krøv, ið almenningurin setir til samfelagið, tað er neyðugt fyri at gjalda tey krøv, borgarin setir tingmonnum, og sum verða samtykt her í løgtinginum, og hesar samtyktir kosta oftast ein hóp av peningi. Einki her er ókeypis, og sostatt má rokningin koma so ella so, men vit kunnu so halda fram við at geva hvørjum øðrum skyldina fyri, at so illa er statt, at lænast má fyri útgjald av lønum.

Javnaðarflokkurin og sjálvstýrisflokkurin eru fullkomiliga villir, teir vaska tær flestu hendur í sterkum lúti, nú vita teir alt um alt, men nú ræður sjálvandi um at venda rætta vegin. Sosialurin og Krossur eru á tremur av meira og minni villandi politiskum viðmerkingum.

Harra formaður, Atli Dam var heruppi í gjár, og hann metti, at eingin stýring hevði verið í hesum samfelagnum seinastu tíggju mánaðirnar, ein annar í fyrrverandi samgonguni, Niels Pauli Danielsen, metti, at eingin stýring hevði verið í 18 mánaðir, vit onnur halda, at her hevur eingin stýring verið í fleiri ár. Sjálvstýrisflokkurin hevur verið her, kropp á kroppi hava teir verið uppi og boðað frá, at teir hava ein ella annan nýggjan politikk, men ringt hevur verið at fingið eyga á hendan politikk. Tingmaðurin Tórbjørn Poulsen harmaðist um í gjár í sínum innleggi, at Leikpallur Føroya var mirkaður við nøkrum krónum. Sjálvandi skulu vit hava mentan, og vit skulu hava list, og hin vegin, tá aðrir verða skornir niður, munnu teir verða við. Tað eru serliga Tjóðveldisflokkurin og sambandsflokkurin, sum fáa av at vita. Peningsstovnar, fiskasøla, spekulantar og onnur eru rótin til alt ilt, tey eru atvoldin til allan hurlivasan, landið er komið í. Tað kundi næstan tjóðað sum, at javnaðarflokkurin, sjálvstýrisflokkurin, fyri ikki at tala um kristiliga vóru púra sakleysir í hesum her politikkinum.

Annars er hetta her, sum nú er farið fram, somu endursendingar, eins og fyri valið fyri fýra árum síðani, tá formaðurin í javnaðarflokkinum, Atli Dam, bað geva sær 500 dagar. Tá segði hann m.a., at fiskivinnumynstrið skuldi broytast, peningsstovnarnir skuldu "makka rætt", fiskasølan skuldi fáa aðra bók at lesa í o.s.fr. Búskapurin skuldi nú koma aftur á føtur.

Sambandsflokkurin og fólkaflokkurin vóru samanbornir við pest og kolera, har var so einki at vænta. Hesin sami Atli Dam, fekk so tað, hann bað um, og ríkiliga tað. So var at fara til arbeiðis. Eykagjøld, 12-14.000 kr. vóru lagdar á hvørt húsarhald, alt hildið uttan fyri prístalsskipanina, enntá oljan fekk sitt, og

tey sokallaðu veiku, tey skuldu ikki bara svøltast, tey skuldu eisini ágyggja í kulda. Farmaskipinini, vórðu latin fyri lítið og lætt, blokkin fingu vit heim, og harvið øktar útreiðslur, almennar útreiðslur, og so var farið í holt við at byggja eina serie av deyðadømdum svartkjaftaskipum í 100-millióna klassanum. Síðani tók oin rød av ósemjum seg uppá arbeiðsmarknaðinum fyri alt landið. Fakfelagsrørslurnar mótmæltu harðliga, summi søgdu limaskapin upp í ávísum flokki, meðan onnur lovaðu at stovna nýggjan arbeiðaraflokk, alt landið var á gosi.

Soleiðis gingu hesir fyrstu 500 dagarnir í táverandi samgongu, men so hendi nakað í samfelagnum. Peningurin floymir inn í landið sum organtíð fyrr, uttan at nakar talar at. Milliónir oman á milliónir streyma inn í landskassan, øll neyð og øll ónøgd varð gloymd. Figgjarlógin, tað almenna virksemið tvífaldaðist og væl tað, fólk fingu sokallaðar afturberingar, orlov við løn, vit fingu egið flogfar og fingu hangar fyri 60-70 milliónir kr., og soleiðis kundi ein hildið fram. Alt var gloymt. Her var eingin neyð kortini, og limaskapurin hjá hesum ávísu, hann kom aftur í rættlag.

Tey, sum av og á gjørdu sær ómak at hyggja eftir útflutningstølunum, ógvaðust. Her fór at enda galið.

Fyrrverandi løgmaður vist betri enn nakar annar, at støðan var depserat. Einki varð hildið av tí, hann hevði lovað og sagt, alt lá í sori búskaparliga, verri enn nakrantíð. Vit høvdu lænt okkum fram tíl eina velferð, eina skuld upp á 7 mia. kr., meðan framleiðsluvirðið hevði staðið í stað. Men sjálvandi nú nærkaðist valið, og nú galt um at hava alt koyrandi, fara stillisliga um hurðarnar, tosa minst møguligt um tøl, ið hvussu er ikki um tey røttu tølini, yvirtrekk her og har, kassin var um at tømast, ella hann var kanska vorðin tómur. Tað næmasta, hesin táverandi løgmaður kom hesi hættisligu støðu, var í seinastu løgmansrøðu, hann hevði fyri einum ári síðani, tá kunngjørdi hann sjálvur hesi visdómsorðini, at einki gildi er ókeypis, rokning kemur so ella so. Hann tordi bara ikki at skriva hesa rokning út, tað lat hann aðrar um at gera, meðan hann og javnaðarflokkurin og aðrir samgongupartnarar tá nú sóla sær í

tolm skerjingum, sum neyðugar eru at gera, um vit ikki skulu koma undir fremmanda stýring. Harafturat setir fjavmaðarflokkurin, tó hvussu er sambært hesum skjali, øll segl fyri at billa Peri og Póli inn, at besar inntøkur, sum vórðu samtyktar í summar, sum hetta landsstýrið noyddist at seta í verk, eru at gjalda úttanlandsskuldina við, tair sjálvir stóðu fadrar til. Onkur hevur sagt: "Sig tað nóg ofta, so fjøldin trýr tí!"

Inntøkulógirnar oru heilt einfalt til at gjalda gildið, Atli Dam, fjavmaðarflokkurin og aðrir skipaðu fyri seinastu fýra árini, nú figgjarlógin er vaksin okkum upp um høvdið, meðan inntøkurnar sum sagt hava staðið í stað. Men nóast hetta uppskotið til figgjarlóg inniber skerjingar og tálman av ymsum almennum arbeiðum, eru vit illa fyri at bera hesa byrðu kortini. Men harra formaður, eina figgjarlóg skulu vit hava, so umboð fleksins vilja geva hesum uppskotinum eina nágreinilliga viðgerð í figgjarnevndini.

Atli Dam (jv.)

Harra formaður.

Pauli Ellefsen kunngjørdi í einum av sínum vanligu postulátum uttan prógvførslu, at sambandsflokkurin kundi havt minkað um toll og skatt. Eg siggi tað solsiðis, at hann nú fer undir at reka ein politikk, sum byggir á somu lystir, sum fólkaflokkurin hevur givið ferð eftir ferð, sum hann gav í 60'unum, í 70'unum, í 80'unum, at nú fáa vit minni toll og skatt. Gott nokk, tá vit fyrst eina tíð hava rindað nakað munandi meira, og at ein nú er byrjaður at reka ein politikk, sum ikki hevur hepnast aðra staðir heldur.

Kanska tað er frægast at samanbera okkum við tað stýrið, sum vit hava havt í Danmark í 7 ár, og sum hevur tikið dønum 7 ár at verða sannførdir um, at tann lovaða skattaminkingin, tann lovaða lækkingin kom ikki, meðan figgjarlógir verða settar upp, sum ein "kunstiga" kallar sparingar, tí ymisk sikt verða sett til sparimál, og sum so skal sparast í mun til, so meðan ein veruliga spakuliga hækkar figgjarlógina, og tað er veruliga tað

sama, sum hendir í dag, er skattatrýstið vorðið so líðani økt. Vit hoyrdu Hergeir Nielsen siga frá í áðni, so er tað 53% í Danmark, og nú er tað gingið upp fyri dønum hetta her, sum her hevur gingið fyri seg. Tað verður nokk skjótari hjá okkum her í Føroyum at fáa avdúkað hatta spælið hjá teimum, tá konna eitt lítið sindur til lagið í Danmark. Eg navi ikki sagt, at fólk ikki fær peningin aftur, sum tey hava spart upp hetta fyrsta árið, ella sum landskassin lænir fyrsta árið og brúkar, tað navi eg ikki sagt, men eg havi sagt, at tey fáa tað bert aftur, um tey rinda tað í minsta lagi einaferð aftrat inn í landskassan, ella slíkar skerjingar verða gjøgnumførdar, sum í og fyri seg merkja, at skattgjaldarin rindar hesa upphæddina eina ferð aftrat, og helst skal lóggávan fylgjast, skal tað rindast hálva aðru ferð aftrat, tí pensjónir, gjald til pensjónir er sum kunnugt frádráttarheimilað í skattaskipanini, so fyri at fáa pening í 1992 til at gjalda hetta her, má Føroyaða ella skattaborgarin gjalda hálva aðru ferð aftrat. At siga tað, er ikki tað sama sum at siga at fáa peningin aftur, tí eg vísti bara á, at hetta eru avleiðingarnar av, at fólk skal hava peningin aftur.

So kann ein sjálvandi finna sær "einaferð"-inntøkur við sokallaðum privatiseringum, soleiðis sum ætlanin eisini er í Danmark, so sum søla av einj ferju her og onkrum góðsi har o.s.fr., men tað sigur alt tað sama. Tað er eingin sparing, og tað gevur ikki grundarlag fyri nakrari lækking av skatti, og tað sama fer at henda her, so ella mín spádómur er, at roknskapurin fyri 1990, tá hann annars verður grannskoðaður av grannskoðanarvirkinum, verður at sýna heilt, heilt onnur tøl enn tann fíggjarlóg, sum fyriliggur í dag, tó hvussu so er um ætlanin er at halda fram við tí politikki, sum er stungin út í kortið nú.

Eg ætlaði at siga nøkur orð um uttanlandsskuldina. Eg segði í gjár, tað kanska var uttan mið og mál at liggja og skjóta skyldina fyri hetta her upp á hvønn annan, men eg kann ikki lata vera við at siga, at tá ið nu menn so dúgliga, hæði Jógvan Sundstein, løgmaður,

Pauli Ellefsen og Kilif Samuelsen so ógvuliga hava roynt at greiða frá, at vit øll eiga lut í hesum her, hesi uttanlandsskuldini, tí vit hava fingið ágóðan av tí arbeiði, sum hevur spurst burtur úr hesum her, so er tað nokk so forkrampað, tí framstandandi búskaparfrøðingar hava víst á, at ein uttanlandsskuld í sær sjálvum ikki er so vandamikil, um ein hevur eina skipan, har tann, stendur við ábyrgdini, sum hevur lænt peningin. Men tað, sum fyrigongur her í dag, tað er, at roynt verður at fáa koppað hesa ábyrgdina yvir á skattaborgararnar við eini umfordeilingsskipan, sum verður so sterkt økt, soleiðis, at sama lega í figgjarlógini verður hildin, men gjørdi sterktu umfordeilingsskipanina frá skattaborgaranum til onnur í samfelagnum, harvið fæst møguleikin fyri at koppa partar av uttanlandsskuldini.

Ja, nú hava menn enntá tosað um at taka 9.000 mia. heim soleiðis, at landskassin upp á tað nærmasta kann yvirtaka alla uttanlandsskuldina soleiðis at skattaborgarin hevur ábyrgdina av eini samlaðari, uttanlandsskuld við at hon verður umfíggjað, men tíbetri, og tað eri eg ógvuliga fegin um, so avdúkar løgmaður tað, at hann er sera ivasamur um hendan møguleikan, og heilt burtursæð frá, um lánstilboðið er seriøst ella ikki, so eri eg glaður fyri tann ivan, tí fara vit longur tann vegin at økja um veðhaldsskyldurnar hjá tí almenna

lættari er tað at fáa skattaborgaran at gjalda tann partin av uttanlandsskuldini, sum hann endiliga hevur skilt, at hann so ógvuliga lítið eigur í. Har skulu kanska 20 og 30 greinar til at gera tað klárt, sum ein skemtiteknari á baksíðuni í Sosialinum formáddi í eini tekning. Tí er tað kanska so reyðugt nú, at menn koma her kropp av kroppi og greiða frá, at skattaborgarin jú eigur hesa uttanlandsskuldina, sum m.a. hesir menn hava tikið heim til ymisk endamál. So hatta vil eg ávara harðliga í móti og vísa á, at hatta er fyri so vítt samanhangandi.

Rentuskattaskipanin, sum eg vísti á í gjár, og sum Tordur Niclasen ikki vildi verða við til at broyta, er pápi at nógv størri parti av uttanlandsskuldini enn t.d.

realkreditlánini.

Jørdur Niclasen (kff.) viðmerking

Harra formaður.

Til seinasta ærað røðara. Tá ið hann sigur, at Kristiligi Fólkaflokkurin ikki vildi verða við til at broyta rentuskattaskipanina, so er tað rætt. Vit vildu ikki verða við til at broyta hana eftir uppskriftini hjá Javnaðarflokkinum, har talan var um at eina skipan, sum hevði við nettorentuna at gera hjá tí vanliga lønmóttakaranum, hjá honum, sum fíggjaði síni hús við lánum og sum annars hevði nakrar pengar innistandandi. Men tá ið spurningurin um, at broyta rentuskattaskipanina, kemur so langt, at ráma persónar sum í spekulatiónsætlan taka milliónir heim úr útlandinum fyri at seta inn í føroyskar bankar og so viðari spekulera, tá vilja vit tegin verða við, og tað skal henda samgongan eisini fáa at siggja.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Atli Dam fekk tað til, at eg í áðni lovaði skattalætta.Tað, sum eg segði var, at um sambandspolitikkur hevði verið førdur aftan á 1974, so kundu vit saktans givið skattalætta í mun til skattalógirnar í dag og stóran skattalætta, tað var tað, sum eg segði, men har fyri verður ikki sagt, at okkara mál ikki er, at geva skattalætta, men tað er treytað av, at vit spara, m.a. at vit spara nóg mikið á fíggjarlógini og helst meir enn tað, sum vit hava gjørt sambært uppskotið.

Atli Dam stendur her og grætur um umfordeiling. Ein ungur vágmaður, sum júst er komin á ting, spurdi um hesa umfordeilingina í samband við játtanina av nøkrum í 70 mió.kr. til nakrar, men sum skuldu upphøgga síni skip og spurdi, hvat er tað fyri, hvat kostar hetta? Eg haldi, at Atli Dam skuldi verið tann seinasti at tosa um umfordeiling í forhold til stattaborgaran.

So hevur Atli Dam verið inni og tosað um tað lán ið, sum landskassin tekur frá okkum borgarum, frá Atla Dam og fra mær o.ø. frá nú og til 1992. og sum skal gjaldast aftur við 5% í rentu, at tað skal gjaldast fleiri ferðir aftur. Hetta er fullkomiliga hurtur við, hetta er eitt lán í grundini á sama hátt, sum um at man tók eitt bankalán ella eitt uttanlandslán. soleiðis skal tað gjaldast og eisini renturnar, men tað er einki mystiskt í hesum her. Tað, sum eg ikki kann lata vera við at hugsa um er, hvi er tað, at andstøðan er so bebbaredd fyri, at tað skal eydnast okkum at spara nóg mikið á fíggjarlógini? Teir eru bangnir fyri, at vit verða førir fyri at gjalda hetta aftur uttan nakað, og tað er okkara mál. Tað er einki mystiskt í hesum av nøkrum slag. Fíggjarlógin hevði sæð fullkomiliga øðrvísi út, um Atli Dam ikki vendi 180 gradir í 1974 og framdi ein heilt annan politikk, og hvat hevur Atli Dam ført fram nú, í móti Tjóðveldisflokkinum síðan henda samgonga varð gjørd. Hvat er tað, ið hevði verið munurin, sum Atli Dam sigur, vit høvdu havt fingið nógv meir yvirtøkur. Tað er tað einasta, sum man hevur víst á hevði verið øðrvísi, um vit tóku Javnaðarflokkinum upp í staðin fyri, fleiri yvirtøkur. Tær kosta eisini pengar, so hevði fíggjarlógin verið uppaftur hægri.

Eilif Samuelsen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Atli Dam nevndi hetta við uttanlandsskuldini. Eg nevndi í mínum fyrsta innleggið, hvør ið eigur hesa uttanlandsskuldina, og at vanligi borgarin eisini eigur sín lut í henni í og við, at hann nýtir allar teir facilitetir sum eru goldnir av hesi uttanlandsskuldini, men eg legði eisini aftrat, at tað er einki ilt í tí, at tann vanligi borgarin eigur part í uttanlandsskuldini, men spurningurin er bara, hvør ið rindar hesa uttanlandsskuldina aftur.

Hesi tiltøkini, sum eru sett í verk nú fyri at fáa pengar inn, eru ikki fyri, at tann vanligi borgarin skal gjalda hesa uttanlandsskuldina aftur, men tað er fyri at

minka um innflutningin hjá okkum soleiðis, at tann partur in av uttanlandsskuldini, sum veksir við, at gjaldsjavnahallið veksur er tað, sum vit vilja hava burtur. Tað hevur verið tosað um rentuspeklatión, og tað er einki at ivast í, at nakað av hesi uttanlandsskuldini, serliga tær síðstu 2 mia.kr. er spekulatión. Men tað er einki at ivast í, at teir menninir, sum hava tikið tað aftur kunnu nokk rinda hesa uttanlandsskuldina aftur, tí tað almenna eigur bara 30% av henni, og tað privata eigur 70% av henni, og teir privatu teir skulu nokk gjalda tað aftur, men tey 30%, tað eru tey sum eru farlig, og tað er serliga farligt, um tey vaksa mógv, og tað er tað, sum vit vilja steðga við hesum her.

Atli Dam (jv.)

Sjálvsagt, hevur Javnaðarflokkurin einki í móti, at tað verða framdar sparingar, ið hvussu so er eru tær sosialt avvegaðar og ikki venda bert í móti einum parti av fólkinum soleiðis, ella koma at kennast av bert einum parti av fólkinum soleiðis, sum tað er vandi fyri, har t.d. tað, eg nevndi í áðni, hvar fólkini skulu gjalda fyri ymsa viðgerð, tey skulu hava innan fyri heilsuverki o.s.fr., so lat okkum bara siggja. Eg havi framvegis ein spádóm um gongdina í 1990 ella rættari sagt tveir. Tað verður ein munandi likviditetskreppa líðliga í árinum, og tað verður ein heilt annar landskassarokniskapur enn tann, sum ætlaður er við hesi figgjarlógini, sum vit fáa at siggja.

Til Tord Niclasen. Tann broyting í rentuskattaskipanini, sum vit arbeiddu við, kundi saktans brúkast við nettorentum. Tú kundi leggja eitt mark inn fyri innstøðu, áðrenn tú mótroknaði, og tað bjóðaðu vit eisini, men tit vóru so forstokkaðir viðvíkjandi hesum her, at har var einki at gera, tí sjálvsagt ber tað til, at broyta rentuskattaskipanina soleiðis, eitt nú við at lækka frádráttin fyri bara rentu, um tú so gevur ein annan frádrátt í staðin fyri, møguliga fyri avdrøg, ella tú gevur teimum, sum hava bygt hús eitt ella annað tilskot.

Tað ber væl til, at forma hesa rentuskattaskipan soleiðis, at man varðveitir tað uppsparandi elementið, sum er í tí, at tú bara skattar við einum ávísum prosenti av innstøðuni, bara tú skipar tað soleiðis, at tú tekur spekulatións elementið burturúr, men tit vóru í og fyri seg hvørki til at høgga ella stinga í í tí sambandinum tíverri. So var Sjálvstýrisflokkurin eisini av tí liðnum, sum ikki vildi verða við til veruliga at arbeiða fyri at fáa hesar broytingar, so høvdu vit, tó hvussu so er, verið eitt sindur frægari fyri, men eg segði í mínum fyrra innleggi, at hetta verður neyðugt at gera, og eg eri glaður fyri, at bæði Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava boðað frá, at teir vilja arbeiða við hesum her, og okkara lutur skal ikki liggja eftir við at fáa eina skipan har, sum kann brúkast, og sum verðveitir tað positiva og strikar tað negativa.

Jógvan Durhuus (tf.)

Harra formaður,

Nú hevur orðaskiftið um løgmansrøðuna og fíggjarlógina fyri 1989 var í 2 dagar og hava tinglimir, sum rímiligt er, sveina ógvuliga víða, men nú tykist at siggjast fyri einum enda.

Andstøðuflokkarnir hava verið atfinningasamir uttan tó at hava komið við nøkrum grundleggjandi konkretum loysnum, sum framsøgumaður sjálvstýrisfloksins plagar at taka til. Hann fanst at studninginum til djúpvatnstrolarar og meinti, at hesir kundu strikast uttan nakað víðari, hóast tað vildi kosta nógv arbeiðspláss, serliga nógv á ávísum plássum. Tað kom einki konkret uppskot, sum kundi bøta móti arbeiðsloysi. Hesin sami tingmaður var biðin at koma við loysnum, sum hann segði seg liggja inni við, men har kom einki og tað var heldur ikki væntandi.

Framsøgumaður javnaðarfloksins varð av Jóngerð Purkhús eisini biðin um, at koma við ítøkiligum uppskotum, sum teir søgdu seg at hava, men teir siga seg ikki hava stundir við eitt slíkt orðaskifti at skitsa upp, hvat teir ætla, hóast teir viðganga, at ein ávis

kreppa er í samfelagnum aðru hvørja løtu og aðru hvørja løtu, so siga teir, at tað er eingin kreppa. Vit hava sitið saman við Javnaðarflokkinum í undanfarna landsstýri, hetta skal ikki takast sum negativur kritikkur sum so, men undanfarna landsstýrið viðgekk so mikið um kreppu, at tað var neyðugt, at seta eina serlánsskipan í gongd og hon hjálpti so ávegis og hjálpir framvegis nøkrum av okkara skipum, sum eru illa fyri. Vit í Tjóðveldisflokkinum tora at viðganga hesar trupulleikar, sum tíverri framhaldandi hava verið ov drúgvir og helst orsakað av ov vánaligum útfluðningsprísum og minkandi fiskanøgdum, men vit vilja verða við til at finna gongdar leiðir og vónandi koma vit á mál.

Eg skal takka Jógvani Olsen fyri greitt svar upp á fyrispurning mín viðvíkjandi sjóvinnuráði og somuleiðis viðvíkjandi streymorkuverki í Vestmannasundi.

Viðvíkjandi heilsumálum, so kann eg taka fult undir við teimum sjónarmiðum, sum Karin Kjølbro førdi fram viðvíkjandi deild 4 á landssjúkrahúsinum, psykiatrisku deildunum, at mær tykir tað púra ógjørligt, at ein slík deild kann verða latin aftur, og somuleiðis harmar tað meg, at økissálarlæknin skal ikki koma at virka úti á økjunum runt um landi, hví? Tá ið hetta mál varð reist, og tá ið vit fingu hesa játtan fram, so var tað fyri, at fyribyrgja sum mest av innleggingum. Skal tað kosta nógvar innleggingar at strika ein slíkan lækna, so vænti eg tað, at landsstýrið mótsigur sær sjálvum við at steingja ta deildina, sum skuldi tikið í móti teimum, so her meti eg, at vit í fíggjarnevndini koma at byggja álvarsliga upp á henda spurningin.

Tað var Petur Reinert, sum hevði sína framúrskarandi talu og hann segði bert út, at skipini ganga ikki uttan studning, fiskavirkini ganga ikki uttan studning. So kemur Niels Pauli Danielsen, sum tann klóki profeturin og sigur frá, at kreppan byrjaði, tá ið Petur Reinert varð landsstýrismaður í 1975, og nú er hon komin í hæddina,
hvør skal siga, at tann oljukreppan, sum byrjaði í 1975, hana byrjaði Petur Reinert. At ein maður sum dagliga

skuldi verið kenur í at leggja skriftir út, leggur skriftina soleiðis út, tað verður honum fyri at standa, men tað harmar meg, at eitt maður skal finna upp á tvá tingsins røðarapalli at siga, at Petur Reinert skapti oljukreppuna. Vit vita øll, at tað, sum hendi mitt í 70unum var, at oljuprísirnir fóru so langt upp saman við, at gruncprísirnir svíku, at fiskivinnan lá púra deyð tá. Tað var ikki einum manni fyri at takka, men vit kunnu takka honum fyri, at hann kom inn sum landsstýrismaður og fann eina loysn, sum engin hevur verið førur fyri at broytt í dag.

Tá ið Atli Dam tosar um skerjingar á sjúkrahúsøkinum og við betalingshospitalum, so eri eg samdur við honum í, at tað kann verða vandi við eini slíkari privatisering, og tá ið hann tosar um snikjandi stuldur av skattapeningi, so eri eg eisini samdur við honum, men tað kundi verið nokk so áhugavert at vita, hvør kokkurin er til tann rættin, sum vit finna fátæksliga í fylgisskjølunum, tað kann verða, Javnaðarflokkurin kemmir meira til tað enn vit aðrir.

Pauli Ellefsen vísir á, at hetta var tað keðiligasta orðaskiftið, hann hevði upplivað, síðan hann kom á ting í 1974, hann vísti eisini á, at Petur Reinert hevði nevnt okkurt um, at orðalagið í tinginum var broytt nógv, men vit, sum komu á ting, áðrenn Pauli Ellefsen minnast, hvør ið broytti orðalagið á tingi og tað so munandi. Eg skal láta vera við at nevna hin persónin, sum ikki er her í dag, hann fær ikki vart seg, men ið hvussu so er aðnar av gubbunum til tað orðalagið, um tað er ljótt. Hann er ið hvussu so er tann persónur, sum heldur hetta orðaskiftið verða keðiligt, hinvegin vil eg siga, sjáldan hevur hann skikkað sær so væl sum í dag. Tá ið tað verður sagt av hesum sama, at hann siterar Petur Reinert, at allir hava skyld í trupulleikunum, allir hava skyldu til at loysa trupulleikarnar, men so leggur hann aftrat, eg má við formansins loyvi fáa loyvi at siga tað, at Sambandsflokkurin var fullkomiliga uttan mistøk, hann var fullkomiliga og hevur verið fullkomiliga feilfriur. At tað kann bera til at siga slíkt, tí vit vita, hvør var ráðgevið, tá ið farmaskipini vórðu

bygd og hvør var løgmaður, tá ið hesi vórðu kontraktað, vit vita, hvussu lítið samsvar var í millum innløgumøguleika og gjaldsmøguleikar hjá hesum skipum. Vit vita, hvussu lítið fyri ikki at siga einki var avsett móti tapi, tá ið tey komu. Hvør var tann feilfríi her, hvør var tað, sum einki mistak gjørdi, hvør var tað, sum bara sá, at allir hinir gjørdu mistøk? Eg má siga, at tað ber ikki til at standa og skylda upp á allar.

Vit í Tjóðveldisflokkinum, hava vit gjørt mistøk, gjørdu vit mistøk undir síðst landsstýri eitt nú við at fáa eitt av stóran svartkjaftaflota, so taka vit ábyrgd av tí, vit leypa ikki frá, vit skulu eisini verða við til at útskriva rokningar, tá tær skulu gjaldast.

Nú fer so fíggjarlógin í fíggjarnevndina, og vilja vit í Tjóðveldisflokkinum við ábyrgd viðgera hana og vónandi koma vit fram til eitt gott úrslit. Takk fyri.

Niels Pauli Danielsen (kff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var Jógvan Durhuus, sum legði meg undir at hava sagt, at Petur Reinert hevði skapt oljukreppuna, hetta havi eg ikki sagt, Harra formaður. Bandið her í løgtinginum kann verða spælt umaftur, og so fær Jógvan Durhuus at hoyra, at hetta havi eg ongantíð sagt, eg havi ikki nevnt oljukreppuna við einum einasta orði, men eg havi sagt, at kreppan í fiskivinnuni byrjaði í 1975 og hevur staðið við og versnað alla tíðina og tey fyrstu nógvu árini, hevði Petur Reinert ábyrgdina. Tað sum eg meinti við, tað var tað, at tá byrjaði man hesa trolingina bæði uttan og innan fyri 12, og at tað var eingin stýring á henni, tað var tað, sum eg meinti við. Tann trolingin, hon er tað sum ger, at vit noyðast at stuðla fiskivinnuni so nógv sum møguligt í dag, m.a. fáa vit 11.000 tons úr Íslandi, 2.000 tons av toski og 9.000 tons av øðrum botnfiski.

Tað kemur væl við í nógvum húsarhaldum í Føroyum, og hesin fiskur verður fiskaður við húki. Um trolararnir høvdu fiskað hann, so fót triðingurin upp til olju, arabararnir fingu tað ella teir, sum levera oljuna, tað

er tað, sum eg meini við.

Tað er ovr
galið her á Føroyaleiðini, her fiska vit 98.000 tons og her fer triðingurin upp í olju. Tað er tað, sum eg meinti við, tað var Petur Reinert pápi at og ráfiska-grunnurin og alt tað, tað var tað, sum eg sipaði til og ikki nakra oljukreppu.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Jógvan Durhuus siterað meg fyri at hava sagt, at Sambandsflokkurin var fullkomliga feilfrír, tað er skeivt siterað. Vit hava gjørt feilir, vit hava gjørt nógvar feilir, men vit hava bara gjørt relativt smáar feilir, tað er munurin á Tjóðveldisflokkinum og Sambandsflokkinum.

Nú tekur Jógvan Durhuus farmaskipini. Vit gjørdu ein lítlan feil við at játta farmaskipini, tey komu eitt sindur ov tíðliga, tað var ein lítil feilur, men tann stóri feilurin var, tá ið teir avhøvdaðu farmaskipini, sum nú høvdu givið nógvar pengar, og sum nú kosta dupult so nógv, sum vit lótu tey fara fyri. Tað var ein stórur feilur, tá ið man tekur Petur Reinert fyri inntøku fyri alt hetta her.

Eg minnist Petur Reinert og Jógvan Durhuus og allar, tá ið teir søgdi við Palleba, við veljaran, vit kunnu liva í sús og dús av ríkidóminum á Føroyagrunnunum, hvørt mannsbarn í Føroyum minnist henda hernaðin á Føroyagrunnurin, okkara ríku grunnar. Vit kunnu skippa kvotur og annað, Føroyagrunninum kunnu vit liva av. Niels Pauli Danielsen var við í kórinum, hann minnist tað, eg síggi tá á honum. Nú veit ein og hvør, hvussu tað gongur at liva av Føroyagrunnunum. Petur Reinert var her uppi í áðni og segði, hvørt eitt einasta skip gevur hall, hvørt virki gevur hall, alt gevur hall, hatta var ein veldugur feilur. Sambandsflokkurin er ikki feilfrí-ur, vit hava gjørt nógvar smáar feilir.

Tordur Niclasen (kitf.) viðmerking

Harra formaður.

Til seinasta ærəða røðara Jógvan Durhuus. Hann kemur upp higar og hálva vegna grætur yvir tær ætlanir, sum landsstýrið hevur í samband við heilsuverkið, eitt nú at lata aftur psykiatrisku deild 4, eitt nú, at økissálarlæknin nú ikki kemur at virka soleiðis, sum hann skuldi. Sambært Olaf Olsen, so er tað eitt sama landsstýri sum hevur staðið aftan fyri henda niðurskurðin, hetta er gjørt væl at merkja við fullum stuðli frá Tjóðveldisflokkinum, men tað er bara óført, um so er at Jógvan Durhuus meinar nakað við tað, sum hann sigur her, tí møguleiki verður at broyta hetta í figgjarnevndini og tað er bara gleðiligt, at hann tekur undir við okkum við tí skeivleikanum, sum her fyriliggur. Men so fari eg at loyva mær at spyrja ærəða løgtingslimin eitt. Tekur hann undir við, og tekur Tjóðveldisflokkurin undir við, at ætlan er nú í heilsuverkinum í sjúkrahúsverkinum at innføra gjald fyri labratoriu-og røntgentænastur? Tað liggur tú við í hesi ætlan landsstýrisins. Hetta eru nýggjar leiðir og hetta eru leiðir, sum koma at raka tey minnu mertu uppaftur meira enn higartil.

Hergeir Nielsen (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Tað skulu verða tvær stuttar viðmerkingar til tað, sum Pauli Ellefsen førdi fram. Tað var henda háðanin um, at vit ikki vóru førir fyri at liva av Føroyagrunnunum. Pauli Ellefsen hevur nú gjørt eina samgongu, og eg vil fegin hava at vita frá honum, hvørjum øðrum vit skulu liva av í framtíðini uttan júst Føroyagrunnunum. Hitt var enn einaferð endurtikið, at undanfarna samgonga avhøvdaði farmaskipaflotan. Fólkaflokkurin skuldsetur tað samgonguna fyri tað og Sambandsflokkurin skuldsetur tað samgonguna fyri tað. Eg sat sjálvur sum løgtingsformaður tá, bæði Pauli Ellefsen og Jógvan Sundstein góvu táverandi løgtingsformanni ein seðil, hvar á tað stóð, eventuelt farmaskipaflotin, tað var meðan landsstýrið

viðgjørdi málið og tað var aftan á, at tað var tráboðan av tingmálum soleiðis, at framløguførleistin kundi verða hildin. Báðir sóttu í annastøðu, men hvørki annar ella annar leçði tað málið á Lingborð, teir høvdu møguleikan at reisa málið her í tinginum. Teir gjørdu tað ikki. Tað var bara tað.

Lasse Klein (sf.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var Jógvan Sundstein, háttvirdi tingmaður sum kom fram við hesum spurninginum um, at Sjálvstýrisflokkurin var ikki komin fram við nøkrum alternativi í samband við fiskiskapin á djúpum vatni. Tað er sjálvsagt ikki rætt, tí vit eru samdir í tí, at skipini ganga ikki uttan studning, og tað er øllum greitt, men hvørki og so at lata í millum 80 og 90% av inntøkugrundarlagnum hjá hesum skipum, lata tað í almennum studningi, tað er eitt langt lop. Tí kunnu vit hugsa okkum til, at studningurin til t.d. kongafisk og blálongu heldur uppat, og at skipini fáa boð um at avreiða aðra staðir t.d. á týska marknaðinum fyri einar 12-14 kr. kg. Tað letur seg væl gera, og eg eri heilt greiður yvir, at nú var Jógvan inni á hesum, at fleiri fólk blívu arbeiðsleys av hesum. Tað nýtist ikki, eftir tí ætlan sum Sjálvstýrisflokkurin hevur lagt fram fyrr, tí tað verður neyðugt við eini einfaldaðari býtisskipan, har krøv verða sett til øll skip í Føroyum, ið fáa almennan studning, at tey verða við í eini sokallaðari turnusskipan, ið annahvørt tað almenna ella tað privata ella bæði umsita í felag. Tað vilja verða nógvir grundleggjandi fyrimunir í hesum, bæði viðvíkjandi tí, at vit vilja hava skip, sum eru egnað til okkara viðurskiftir, vit sleppa undan óneyðugum íløgum í útbyggingum av skipum. Vit hava eitt greitt uppskot hesum viðvíkjandi, sum samgongan eisini er kunnað um áður.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var Hergeir Nielsen, sum spurdi, hvat eg ætlaði, at vit skulu liva av vit báðir, nú vit eru komnir í samgongu og sum kunnugt, so er statsstuðulin relativt stort fallandi orsakað av politiskum tiltøkum, sum Sambandsflokkurin hevur verið ímóti. Sum kunnugt eru kvoturnar í útlendskum sjógvi eisini fallandi, fyrst og fremst av einum politikki, sum er øðrvisi enn tann, sum Sambands-
flokkurin gekk inn fyri, og soleiðis kundi eg hildið fram. Men nú skulu vit taka tað gleðiliga og tað positiva. Hergeir Nielsen og eg, tað vil siga, Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin vit eru vorðnir samdir um at gera nøkur megnar tøk soleiðis, at vit koma niður á tað neveau sum Sambandsflokkurin altíð segði, at Føroyagrunnarnir høvdu, men sum stendur í ein skerandi mótsetning til tað, sum Hergeir Nielsen og aðrir góvu Palleba lyfti um, skuldi koma burtur úr Føroyagrunnunum. Hatta er realiteturin í hesum spurninginum, men Hergeir Nielsen og eg skulu nokk halda saman, og vit skulu nokk koma niður í tað rætta luftlagi.

Viðvíkjandi farmaskipunum so er tað rætt, sum Hergeir Nielsen segði, men, og eg havi greitt frá tí fyrr her, tað var bara Føroya landsstýri sum panthavari og sum veðhavari sum kundi fara og bjóða upp á hasi skipini og Hergeir Nielsen veit tað, at vit vóru til reiðar at geva stuðul til landsstýrið. Men eitt andstøða kundi ikki leggja uppskot fram á ting um at fara á eina tvangsaktión, tað ber ikki til.

Jógvan Durhuus (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Í samband við síðsta ærað talara hvat farmaskipum viðvíkjur, so segði eg, at ráðgeving og kontraktir, sum vórðu gjørdar tá, høvdu ikki samsvar í inntøkumøguleikan og gjaldsmøguleikan, og eg kann nevna dømir, sum kostaðu um 120 mió.kr.

Harra formaður. Eg vóni, at háttvirdi tingmaður lurtar eftir, tað var skip, sum kostaði um 120 mió.kr., sum ikki hevði søluvirði upp á 50 mió.kr. Tað vil siga,

at tað var fullkomiliga burtur við, men tað var líka langt burtur við prísurin, sum skipini høvdu. Hví var prísuri hægri á øllum skipunum, sum føroyingar bygdu enn á teimum, sum útlendingar bygdu? Hvørjir vóru ráðgevarar? Hvørjir søgdi ja til henda meirkostnaðin, sum undir engum umstøðum kundi bera seg? Líknandi skip vóru bygd í útlondum, tey kostaðu 30 og 40% minni enn øll, sum føroyingar kontraktaðu. Hvørjir vóru ráðgevarar? Hvørjir søgdu ja til hetta her? Hatta er grundin til tað.

So verður sagt, at farmaskipini koyra væl. Jú skip sum fóru á húsagang sjálvt til tann bíligara prísin vórðu samerað, jú. Tey hava lítlan møguleika fyri at yvirliva. Tað skal eingin billa mær inn, at í ti príslegu, sum tey skipini vóru í, at eitt einasta hevði ein møguleika til at yvirliva.

Viðvíkjandi Tordi Niclasen, so eri eg samdur við Tordi. Eg eri ikki fyri, at gjald verður lagt á, og tá ið tað verður sipað til, um henda deildin skal latast aftur ella ikki, so var eg ikki vitandi um tað, fyrr enn eg sá tað í fylgiskjølunum, og eg eri samdur um, at her eigin vit, ið hvussu so er, at verða ógvuliga varnir og gera, hvat vit kunnu fyri at hon verður opin.

At enda verður sagt, at vit skulu liva av Føroyagrunnunum. Hvørjum liva vit annað av enn av Føroyagrunnunum? At niðurgangstíðir hava verið í prísunum og minkandi fiskiskapur, partvíst av ringum veðri, eitt nú í januar og februar í fjør, tað kunnu vit so ikki byrgja fyri uttan nakað víðari, men vit vilja gera okkara besta fyri at útnytta Føroyagrunnin, tí tað, sum útlendingar fiska hjá okkum, tað sleppa teir at fiska aðra staðir fyri. Føroyagrunnurin føðir føroyingar í dag.

Tordur Niclasen (kfff.)

Harra formaður.

Vit hava í Kristiliga Fólkaflokkinum víst á, at sparingar á fíggjarlógini eru neyðugar og vit hava eisini boða frá, at vit vilja medvirka til sparingar, vit eru bara ósamdir við landsstýrið um, hvar sparingar skulu gerast.

Vit hava víst á tey tiltøk sum henda samgonga hevur sett í verk. Hon rakar tey lágtlønnu, hon kemur at tyngja upp aftur meir um byrðarnar hjá teimum, sum hava torført við at fáa endarnar at røkka. Í stóran mun er hetta beinleiðis ein familjufíggindarligur politikkur, sum er komin til sjóndar.

Harra formaður. Nú havi eg ikki verið so ógvuliga nógv inni á sjálvari fíggjarlógini, men eisini her kemur tað klárliga til sjóndar, at tað eru tey, sum hava lítið framman undan, ið skulu knokkroytast. Tær broytingar, sum landsstýrið boðar frá við niðurskurðum á fíggjarlógini, raka serliga familjurnar. Barnastyrkurin verður niðurskorin, og so kann Tjólveldisflokkurin ella Hergeir Nielsen rættari sagt koma upp higar og siga, at vit hava skylduna av at so er, tí at vit skundaðu málið fgjøgnum. Nei, harra formaður, vit eiga at minnast her, at grundin, til at háinntøkurnar eisini komu at verða umfataðar av barnastyrkinum, er ongum uttan sjálvum Tjóðveldisflokkinum, ið hvussu so er einum parti av honum, fyri at takka. Men her er tað, eg loyvi mær at spyrja løgmann, sum umsitur hetta mál. Harra formaður, tað sum stendur í løgmansrøðuni er púra greitt, har verður sagt: Skipanin um barnastyrk verður broytt, soleiðis, at hon bert fevnir um børn undir skúlaaldur. Skal hatta takast fyri tað, sum tað stendur, ella skulu vit leggja oyra til tað, sum aðrir samgongumenn hava ført fram, er tað, at landsstýrið nú hevur ætlanir um, at inntøkuregulera henda barnastyrkin? Tað er ikki plass fyri báðum.

Harra formaður. Viðvíkjandi dagpeningaskipanini, so er tað misvísandi tá ið sagt verður, at har verður eingin niðurskurður, tað framgongur av fylgiskjølunum frá almannastovuni og hyggur man eftir upphæddini, so samsvarar hon til tað, sum landsstýrið ætlar, at her skal ein broyting gerast soleiðis, at nú skal dagpeningaskipanin broytast soleiðis, at tær kvinnur, sum eru heimaarbeiðandi, skulu missa tað, sum teimum varð vunnið gjøgnum tað arbeiði, vit gjørdu í landsstýrinum, nevniliga barnsburðarfarloyvi yvir

dagpeningaskipanina á hædd við onnur. Aftur eitt slag eftir familjuni, og ikki bara tað, at nú skal henda dagpeningaupphædd gjaldast út eftir donskum myndstri, tað vil siga í mun til inntøku frammanundan. Hetta kemur at raka tær kvinnur, sum í tímaløntum arbeiði kring landi strevast á flakavirkjum og á øðrum stovnum. Harra formaður, aftur eitt dømi um, hvussu landsstýrið ætlar at fara hagar, sum lítið er at heinta.

Hilif Samuelsen var her uppi, og hann tosaði viðvíkjandi skúlamálum. Ein skuldu tráð, at vit als ikki vóru í nakrari fíggjarkreppu, soleiðis sum nar varð penslað út og harmast um teir fáu niðurskurðirnar, sum vórðu gjørdir. Tað varð millum annað sagt, sum nakað positivt og nakað at gleðast yvir, at eitt, sum eitur Landsmiðstøð fyri undirvísingarambøð, at tað fær heilar 2 mió. kr. meir enn í undanfarna fíggjarári. Hvat so við tí sum eitir Hjálpitólarmiðstøð, sum skal verða við til at lætta um byrðarnar hjá teimum sum hava tað torført frammanundan í okkara samfelag, tað lækkar við einari hellari millión. Aftur eitt prógv um ójavnan í hesi fíggjarlóg.

Harra formaður, tað er ein vandi sum hevur rakt onnur lond rundan um okkum, sum eisini politikarar her á landi hava verið varir við, og tað er gott, at landsstýrið hevur tikið tað við í sína løgmansræðu, har sagt verður, at vandin fyri vaksandi narkotikamisnýtslu er stórur, og at landsstýrið er sinnað at gera alt, ið gerast kann fyri at fyribyrgja, at narkotika kemur til landið. Eg fari at loyva mær at spyrja løgmann, sum er einasti landsstýrismaður ið er til staðar nú, er tað ráð farið at virkað sum varð sett fyri nøkrum mánaðum síðani, tað narkotikaráð, sum skuldi vera eitt ambað í hondum myndugleikanna fyri at arbeiða í móti hesari misnýtslu. Eg dugi ikki at siggja í fíggjarlógaruppskotinum, at hædd er tikin fyri at økja eftirlitið, tað er møguligt, at tað er tað, men eg dugi ikki at siggja tað, at man soleiðis vil føra ein aktivan narkotikamisnýtslupolitikk. Hinvegin dugi eg at siggja, hvat rúsdrekka viðvíkur, so er upphæddin til rúsdrekkagrunnin skorin niður, upphæddin til Blá Kross heimið er skorin niður í

mun til tað, sum raksturin krevur. Men kanska løgmaður greiðir nærri frá hasum viðvíkjandi.

Eitt annað dømi um, hvussu ójavnin er í hesari fíggjarlóg, er t. d. Leikpallur Føroya, hann fær nógvar reglur í løgmansrøðuni. Henda upphædd, 1,8 mió kr., er júst tann sama, sum ambulansutænastan í Eysturoynni kostar. Men hevur fokuserað upp á at niðurleggja ambulansutænastuna, meðan Leikpallur Føroya verður tikin fram um, sum nakað lívsneyðugt, sum nakað búskaparligt, ið ikki tolir at verða útsett. Nú er tíðin hjá mær farin, og at enda skal eg bara viðmerkja, at longu í kvøld hevur Pauli Ellefsen enn einaferð tikið veljaran til gíssil. Hann sigur viðvíkjandi tvungnu uppsparingini, at tað er ikki eykaskattur, tað er tvungin uppsparing. Eykaskattur til Palleba, men hann kemur bert at fáast aftur, um Sambandsflokkurin kemur styrktur úr einum komandi vali. Longu nú loyvir hann sær at taka veljaran til gíssil á henda hátt, men tað er ikki vist, at tað for at eydnast honum.

Heini O. Heinesen, (tf.) viðmerking

Harra formaður!

Tað skal verða ein viðmerking til undanfarna røðara. Tá hann byrjar røðuna, segði hann soleiðis: Vit hava einki ímóti sparingum, vit vilja fegnir fremja nógvar sparingar. So kemur hann við einari røð av útreiðslufremjandi tiltøkum, har nevnir hann barnastyrkin og annað tílíkt. Men nú er tað, at hann tosaði um hetta her við barnastyrkinum, at barnastyrkurin verður latin eisini háinntøkunum. Eg má siga fyri meg sjálvan, tá ið eg sá at inntøkumarkið, sum skuldi fáa fullan barnastyrk var 300.000 krónur, tá hugsaði eg sum so, har er ikki neyðugt við nakrari regulering. Vit vita tað, at tað eru ung fólk, oftast sum hava bygt sær eini hús, tey verða noydd kanska at tjena 300 - 400.000 krónur fyri at klára rentur og avdrátt av sínum húsum og omaná tað, so skuldu tey fáa 0 krónur í barnastyrki, so ein inntøka er ikki góð nokk til at regulera. Hatta var tað, sum eg ætlaði at siga við Jørd Niclasen um hatta har.

Ker tá ið hann kemur upp her og losar um, at hann ætlar at broyta uppskotið í fíggjarnevndini, so vil eg gera Tord Niclasen varugan við, at skulu vit broyta útreiðslurnar, so mugu vit eisini broyta inntøkurnar, tað haldi eg, at hann skuldi vita. Tað var líka hatta har.

Pauli Ellefsen, (sb.) viðmerking

Harra formaður!

Eg vil afturvísa, at eg havi tikið nakran veljara til gíssil. Her er talan um reinan logikk. Um eg havi lív og heilsuna í nøkur ár afturat, so rokni eg við at hava munandi upphæddir standandi inni sum bundna uppsparing, og eg vil ógvuliga fegin hava tær aftur, sambært galdandi lóg. Skal eg til at velja og skal eg droyma um at velja Tord Niclasen, so má hann siga ja, at hann vil gjalda hesar pengarnar aftur, sum skulu gjaldast aftur eftir galdandi lóg. Tað er tað, sum eg rokni við, at ein og hvør veljari vil hava. Her er tað, at eg vísi á, at Kristiligi Fólkaflokkurin er sera negativur, hann sigur at hatta er eykaskattur, tit fáa tað ikki aftur. Atli Dam er negativur, tit fáa tað ikki aftur. Men vit í Sambandsflokkinum siga, tit fáa teir aftur, og har er tað klárt, sum Eilif Samuelsen segði, at fyritreytin er, at vit hava nóg stóra styrki til at seta Kristiliga Fólkaflokkin upp á pláss og siga, at hetta her er galdandi lóg og hetta skal gjaldast aftur.

Tordur Niclasen, (kfff.) viðmerking

Harra formaður!

Til seinasta ærað røðara, er bert at siga, at um hann mintist uppskotið hjá okkum, so gekk tað út uppá, at skattgjaldarin fekk tað aftur eftir tveimum árum, áðrenn komandi val og ikki soleiðis, sum uppskotið hjá Pauli Ellefsen gekk út uppá, at hann nú, meðan hann hevur brúk fyri hasum pengunum, meðan húsini verða bygd, meðan rentuútreiðslurnar eru stórar, at hann fyrst fær tað aftur, tá ið hann er 65 ár í fyrsta lagi, tá ið hann

er 65 ára gamal.

Harra formaður. Tað er misvísandi, tá tá Heini O. Heinesen her roynir at rættvísgera, hví hann var við til at fella uppskot landsstýrisins um barnastyrk. Hann var við til, at háinntøkurnar skuldu vera umfataðar. Tað var soleiðis, at tað skuldi inntøkuregulerast at byrja við inntøku upp á 350.000 kr., og so skuldi tað minka fyri hvørjar 1.000 kr., inntøkan hækkaði. Heini O. Heinesen sigur tað, at um vit vilja fremja fleiri sparingar á fíggjarlógini, so mugu vit eisini hava fleiri inntøkur. Nei, harra formaður, tað er einfaldari enn so. Tað ber til at flyta sparingarnar, eitt nú tær veldigu sparingarnar, sum Heini O. Heinesen fyrisigur á heilsuverkinum, tað ber til at flyta partar av teimum yvir á onnur umráði, eitt nú sum hansara flokkur umsitur á montaøkinum og kanska á skúlaøkinum eisini, burtursæð frá fólkaskúlanum. Soleiðis kann tað arbeiðast.

Hergeir Nielsen (tf.)

Harra formaður!

Eg haldi fast við, at høvuðsgrundin til, at kinkur kom í handa barnastyrkin, var tann, at Almannastovan fekk boð um at fyrireika hann seint ein fríggjadag, og at hann skuldi vera klárur mánadag. Tí kom alt upp í røkur, tí eitt annað mál varð tikið sum gíssil.

Her hava verið nógv ymisk mál viðgjørd og eitt tað største vandamálið í dagsins politikki, tað havi eg nevnt fyrr í dag, tað er arbeiðsloysi, sum møguliga tekur seg upp, og har eiga vit at hava í huga, hvussu stórar skerjingar, ið tað er skila gott at fremja, áðrenn landskassin fær rokningina aftur í hinum borðinum sum arbeiðsloysisstuðul frá Almannastovuni. Tað er ikki gott, nei Tordur Niclasen, tað er nevnliga ikki gott.

Danska stjórnin, um vit kaga niður í kassan hjá henni, í tann danska landskassan, hóani tað verður sagt, at vit fáa einar 700 mió. kr. um árið, so hevur tann stjórnin sett úti við 25 mia. kr. á fíggjarlógina til bey 270.000 arbeiðsleysu, sum roknað verður við, at har verða. Hetta er ein upphædd upp á 92.000 kr. til

hvønn. Siga vit, at 100 arbeiðsleysir føroyingar melda seg til eina tílíka skipan, so kosta teir, eftir hesum tølum vel at merkja, 9,2 mió. kr. Roknað vit so eitt arbeiðsloysis prosent ájavnt tí í Danmark, nevniliga 8,4, so vil ein føroyskur arbeiðsloysis stuðul kosta 230 mió. kr., ella nakað tað sama sum ein hampuliga burrur undirsjóvartunnil um árið. Ja, tað er bara soleiðis, 2.500 arbeiðsleysir føroyingar á 92.000 kr. tað gevur 230 mió. kr., og tí eiga vit at avviga tey tiltøk, sum nú fara at henda. Vit hoyrdu hetta kvøldið um arbeiðsloysistalið í Íslandi, at tað var ferfaldað, og hetta eru okkum óhugnalig tíðindi, tá ið hugsað verður um, at høvuðsvinnuvegurin har er tann sami.

Vit í Tjóðveldisflokkinum eru fullgreið yvir, at búskaparliga støðan hjá flest øllum húskjum er rættiliga spent. Nøkur klára seg væl við hjálp av fleiri inntøkum, kanska floiri nægri inntøkum í sama húsi, onnur tí at avskrivingar beina skattabyrðuna nakað niður, taka hana heilt burtur enkustøðni. Vit fingu avskrivingarlógina frá 1971 frá Javnaðar- og Sambansdsflokkinum, lógin, sum tey næstu 15 árini ella hálvan mannsaldurin opnaði fyri einari sannari syndaflóð av avskrivingarmøguleikum í privatari inntøku, meðan landskassin í størri og størri mun fór at reka vinnulívið. Henda skipanin legði grundina undir ta íløgugirndina, sum nú í síðsta enda hevur sett okkum í tað ævintýrligu støðu, at skip, sum eru bygd fyri ein stóran part av spardum skattakrónum, sum sostatt eru tiknar úr landskassanum og soleiðis útskrivaðar av Pallaba, pluss beinleiðis kontantum studningsog veðhaldskrónum, eisini tiknar úr landskassanum, miliónum av krónum, nú verða keyp aftur av sama kassa fyri milliónir av krónum fyri at verða søkt í havið. Hetta Inkaríki føroyinga við endan av teirri tjúgundu øldini er nú komið út í ávísar trupulleikar, teir kunnu loysast, eingin ivi um tað, men sum so mangan, tá ið skipsboð koma til at sigla vandasjógv, so eru tað nakrir, ið stinga í sekkin og fara umborð, sum eg segði fyrr í dag, meðan aðrir mynstra av og leggja seg heima. Teir, ið stinga í sekkin og fara umborð henda serliga túrin, gera tað mest fyri at bjarga skútuni, og hyggja í fyrstu at-

løgu ikki eftir, hvørjir, ið skipstelagarnir eru. Tí kunnu vit liva við Sambandsflokkinum eitt tíðarskeið, eitt avmarkað tíðarskeið, meðan Javnaðarflokkurin framí í tíðini kemur at standa sum tann, ið stakk halan í millum beinini.

Harra formaður!

Henda umrøðan er nakað liðin og gjøgnum alla umrøðuna er ein standandi ákæra komin frá andstøðuni, ið gongur út uppá, at tað er tann reini ørskapur, forfylging, fagstaran, knokkroytan og so framvegis, ið vit fremja í móti løntakarunum. Tað kann vera og er nakað um hetta her. Men eg kundi hugsað mær at vent spurninginum við og sagt sum so, at lat bara standa til, lat okkum eysa út til høgru og vinstru, fyri at verða afturvaldir sjálvandi, og leggja vertsin í, hvussu ið samfelagsbúskapurin sær úr. So er tað upp til ein og hvønn at hugsa sær til, hvat ið fer at henda, og ein og hvør kann tosa um hetta eisini, so sum tað hevur verið gjørt hesar dagarnar.

Eg skal ikki siga nakað um henda spurning, men eg skal loyva mær at spyrja, hvat ið hevði hent, um vit ikki fingu eina samgongu, fyrst um ársskiftið og síðani nú aftur í summar aftaná, at Javnaðarflokkurin fekk sprongt Sjálvstýrisflokkin burturúr samgonguni. Størsti parturin av fiskiskipaflotanum hevði ligið bundin við kai. Hvør hevði kunnað reitt út, og hvør hevði tímað at ligið í sjónum við ongum studningi til skip og manning? Eingin, tí at hetta hevði ikki verið fíggjarliga gjørligt. Um so var, at onkur fíggjarliga sterk fyritøka kunni latið skip flotið, ella útróðrarmenn royndu tað tei kundi, teir sum kundu, so høvdu teir einki stað havt at avreitt fiskin í, tí at flakavirkini høvdu verið afturlatin. Hesa støðu trúgvi eg ikki, at nakar tímaløntur hevði kunnað hugsað sær, ikki nakað verkafelag heldur, tí at alt arbeiðið uppi á landi hevði eisini støðgað upp. Tá høvdu vit eisini fingið kravgongur, so tað forslær. Talað hevði verið um ræðuskítar og dugnaloysi, og fremstir í kórinum høvdu verið teir somu, sum rópa harast nú. Nei, Javnaðarflokkurin valdi tann djúpa stólin, hann setti Sjálvstýrisflokkin á knæið og saman

við Kristiliga Fólkaflokkinum sita teir har, sum teir sita og formáa sær burt eitki. Vóru vit her í húsinum ikki førir fyri at latið stuðning, og tað eru vit bara um so er, at vit eru førir fyri at skriva út nakrar inntøkur til landskassan, so var hetta samfelag langt síðani rapað. Innheintingin er ikki eftir tjóðveldismanna hugsan so skynsamilig, sum hon kundi verið, men hon var og er tann einsata møguliga, tá ið hugsa verður um, at Javnaðarflokkurin hopaði eftir hali tá ið hann dugdi at siggja, hvussu álvarsliga skuldi takast til.

Tit hava sjálvir keyrt landskassan á heysin við tykkara mongu veðhaldsútleggum, royna teir nú at trútta niður í fólk, saman við Sambandsflokkinum eisini, vit hoyrdu Flemming Mikkelsen í áðni. Sum um teir ikki vistu, at fiskaprísirnir fullu frá heystinum 1987 og hava verið í botni síðani tá, og tað er jú hesum her, vit liva av at fáa upp úr sjónum, at hagreiða, at tilvirka og at flyta út, og alla tíðina so væl sum gjørligt. Men fiskaprísirnir fullu, okkum restaði einar 180 mió. kr. í meirinntøku frá hesum útflutningi, tá ið landsstýrið varð skipað. Fiskasølan hevur skylduna, siga teir politisku høgt kalibreraðu javnaðarmennirnir. Tað er møguliga og helst soleiðis, svara vit aftur í hinum endanum, men her og nú snýr tað seg ikki um, hvør tað hevði skylduna, og hví førningurin er farin fyri borð. Tað snýr seg um at fáa hann upp á land aftur, upp á turt.

Ger tína skyldu, og krev so tín rætt, geltu teir javnaðarhugsjónina út um geilarnar upp til løgtingsvalið. Tað virkaði, og teir komu sterkir inn, men tá ið tøkini skulu takast, tá ið tað dugnaði í millum fjøllini av umanlopum í føroyskum vinnulívi, skip eftir strípu, Styril, Skála Skipasmiðja, Blue North, Vágs Skipasmiðja og so framvegis, tá hvurvu teir. Gloymd var skyldan hjá veljarunum kring landið, og rættin, teir hildu seg hava vunnið, stungu teir eisini í sokkin og bundu fyri.

Harra formaður!

Javnaðarmaður aftan á javnaðarmann hevur verið her uppi og sparkað okkum tjóðveldismenn á skinnabeinið, og Atli Dam hevur staðið í hurðini og givið teimum riddara-

slag og sagt, hatta var gott hann sjálvur. Men Tjóðveldisflokkurin hevur fult og heilt álit á hesum landi og tí fólki sum her býr. Hann stevnir ímóti, at her skal búgva ein fræls tjóð í einum frælsum landi. Tí spenna vit fyri í samfaringini um, at vit skulu fáa hetta samfelagið at gerast enn betri til at liva í. Eg eri ikki samdir við Pauli Ellefsen um, at vit skulu niður í eitt lægri niveau, tað kann gott vera, at vit skulu upp eftir í niveau og at vit flestu føroyingar skulu royna at vera í sama niveau ikki soleiðis, at summir eru hægri enn aðrir. Vit eiga at troyta nýggjar leiðir, tað eru framvegis nýggjar leiðir eftir. Vit eiga at hava í huga, at vit møguliga koma inn í ein frælsari marknað, ait tað skuldi kanska givið okkum hasar 180 mió. kr. aftur pluss aðrar 180 mió. kr. Eg sigi ikki at vit skulu fara inn í EF, nei.

Tung tøk, tey ræðast vit ikki, háðarans og spottarans orð heidur ikki. Farnir í sambandsleypin eru vit ikki líka so lítlið, sum sambandið er farið í sjálvstýrisleypin. Javnaðarflokkurin háðaði okkum forrestin í 1978 dagin eftir, at vit høvdu gjørt samgongu við Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin, at tjóðveldið fekk onga yvirtøku. Nú reypa teir av, at teir eru tann einasti sanni sjálvstýrisflokkur, men vit kunnu sagtans liva við hesum her, bara vit koma framá í hesum málið. Hetta er tað týdningarmiklasta málið hjá okkum. Og er hetta andstøðumøsnið tyngsta argumentatiónstilfarið hjá Kristiliga Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum og andstøðuleiðaranum Lassa Klein, so eru vit væl farnir og tola tað saktans, eg sigi andstøðuleiðaranum, tí hann er tann einasti, sum er komin við einum konkretum uppskoti um inntøkulógir.

Tað stendur so rimmafast, at Javnaðarflokurin sleppir ikki í nakra samgongu í yvirskoðiliga framtíð, uttan at hann hevur Tjóðveldisflokkin við sær. Hetta er tað, sum pínir Javnaðarflokkin inn á sálina. Atli Dam trýsti Javnaðarflokkin niður í millum tveir stólar og har situr hann. Hann var her uppí í áðni og tosaði um privatisering og segði so, "takið tað bara róligt," tá ið hann tosaði um privatisering innanfyri heilsuverkið.

"Takið tað bara róligt. Javnaðarflokkurin skal nokk ansa eftir tykkum. Hann er uttanfyri.' Vit venda tí við og eru grunnleggandi ósamdir og siga, "takið tað bara róligt, at Tjóðveldisflokkurin er innanfyri, har sum avgerðirnar verða tiknar. Vit eru ikki bangnir fyri, at vit eru farnir inn í hesa samgonguna, tað er gjørt í teirri sannføring um, at vit ganga fram í móti einari bjartari framtíð."

Takk fyri, formaðurin.

Tordur Niclasen (kff.) viðmerking

Harra formaður!

Eg fari at takka seinasta røðara fyri talurna, mær dámdi hana væl, ein stóran part av hennni, og tað sum hann segði um Kristiliga Fólkaflokkin, tað veit eg, at hann ikki meinar, so tað taka vit ikki so tungt. Men eg eri bara harmur um, at fleiri samgongumenn ikki vóru til staðar her í kvøld. Teð, sum vit alla tíðina hava vist á við teimum tiltøkum, sum henda samgonga við Paula Ellefsen á odda hevur framt við teimum tiltøkum, sum koma til sjóndar á fíggjarløgtingslógini, er, harra formaður, at landsstýrið hevur ikki, samgongan hevur ikki gjørt sær far um avleiðingarnar av hesum. Eg samanlíknaði tað í gjárkvøldið við ein skurðlækna, sum skar við bindi fyri eyguni.

Harra formaður. Nú tykist at vakna, nú kemur Hergeir Nielsen upp og sigur tað, at nú mugu vit ansa eftir, nú byrjar hann at tosa um prísin fyri arbeiðsloysi. Byrjar at brúka roknistokkin aðra staðir frá, hvat tað kostar, tá ið man hevur arbeiðsloysi. Tað var júst tað, sum vit vístu á í gjárkvøldið, at í mong ár hava teir sosialistisku kreftirnar roynt at fingið arbeiðsloysisstuðul her á landi, tað hevur ikki eydnast toimum. Vit vóru t.d. í móti, men nú tykist, sum tað fer at eydnast fyrst við politiskum tiltøkum at skapa arbeiðsloysi og síðani at rættvisgera, at nú er neyðugt at veita arbeiðsloysisstuðul, og her er tað, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin fara at geva Tjóðveldisflokkinum høvi at taka sær æruna av til komandi val

kanska longu um 1 ár, at tað var Tjóðveldisflokkurin sum pressaði á, fyri at fáa honda arbeiðsloysisstuðulin, men eg vil takka Hergeiri Nielsen, at hann hevur gjørt sínar samgongumenn varugar við avleiðingar m.a., sum fara at verða arbeiðsloysi og tað er tað, sum eingin av okkum ynskir.

Niels Pauli Danielsen (kfff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var undanfarni røðari Hergeir Nielsen sum ikki kann bara sær, men heldur á við at trútta nakað upp í saman sum eg havi sagt fleiri ferðir er ikki soleiðis. Hann byrjaði røðu sína við, at siga, at eg ein fríggjadag hevði biðið Almannastovuna ella Líkningarráðið gjalda út barnastyrkin mánadag. Eg veit satt at siga einki um hetta, men tað sum eg veit um, tað er tað, at Hergeir Nielsen sum løgtingsformaður í fleiri vikur helt hetta uppskotið í tinginum, og lat tað ikki sleppa til 3. viðgerð, tók tað av skránni. Hann hevði hetta uppskotið sum gísil og ætlaði, at fólkið skuldi ikki fáa barnastyrkin til jólar. Tað, sum eg so gjørdi, tað var tað, at eg bað manning mína, tænastumenninar hjá landsstýrinum, verða klárar tann dag, ið tað kom gjøgnum tingið, um tað kom, um Hergeir loyvdi gíslinum, sum hann hevði tikið at sleppa út. Um tað kom í gjøgnum, verið so klárir, arbeiðið nátt og dag fyri at fáa tað ígjøgnum, tað var tað, sum eg segði, og tað má eg hava loyvi at siga, hann skuldi rósa mær fyri tað, at eg hevði manningina klára, so at fólk fekk tað út fyri jól, men tað var tað sum hann ikki ætlaði. Nú skilji eg, at hann var keddur av tí, at hann ikki fekk fram tað, sum hann ætlaði, at tey ikki skuldi fáa tað, men tey fingu tað, Gud havi lov fyri tað.

Eg haldi, tað var hugstoytt at hoyra her, at Hergeir Nielsen sigur, at hann liggur í sambandsleypinum, og so hyggur hann upp og sigur, nú ganga vit framá, Paulí ber leypin móti bjartari framtíð. Hetta var Tjóðveldisflokkurin í 1989. Hvokkin er hann Grímur av Skóg.

Hergeir Nielsen (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Hetta seinasta hjá Niels Pauli Danielsen var so gott, at eg gerið onga viðmerking til tað. Hann hevur miskilt alt málið og hann ger søgur her uppi í kvøld, fantastiskur maður má eg siga. Hergeir Nielsen hevur ikki eftirhildið hesum málinum sum gísil uppi á borðinum. Grundin til, eg skal taka tað uppaftur, at kinkur kom í hetta málið, var ikki tí Niels Pauli bað Almannastovuna ein fríggjadag um at rinda barnastyrkin út ein mánadag, men Niels Pauli Danielsen gav Almannastovuni boð um at fyrireika hetta stóra málið seint eina viku, eg haldi at tað var ein fríggjadag, tyrt at tað skuldi verða klárt til framløgu ein mánadag, soleiðis hingur tingini saman.

At Tjóðveldisflokkurin hevur pressað á nakran arbeiðsloysisstuðul, tað havi eg ikki talað um við einum einasta orði, tað sum eg segði, tað var, at vit í hesi samgongu eiga at ansa eftir, at vit avviga tiltøkini soleiðis, at vit ikki skapa nakað arbeiðsloysi, og vísti eg við nøkrum dømum um, hvat hetta kann koma at kosta, um vit rinda í sama málistokk, sum aðrir gera tað og kanska har missa meira fyri minni.

Jákup Lindenskov (Jv.)

Harra formaður.

Nú tað líður í móti miðnátt sær út, sum um vit skulu byrja hetta orðaskiftið aftur av nýggjum, tí eftir tí at døma, sum tjóðveldismaðurin Hergeir Nielsen nú legði fram við, so er hann nústani vaknaður í hesum orðaskiftinum og hvat ger maðurin? Jú, hann leggur eftir Javnaðarflokkinum, og tað er ikki við mykindum, so kann ein spyrja. Hví ger maðurin tað? Jú, tað er sjálvsagt tí, at hann sær, at uttan Javnaðarflokkin, so hevði hann yvir hevur ongan møguleika havt til at ført fram alt hetta, sum hann nú vísir á, er so alneyðug í hesum samfelagnum. Tí næstan hvørt einasta mál, sum hevur verið frammi í tinginum undir hesum orðaskifti, øll tey øki í

fíggjarlógini, sum verða hildin fyan her sum so virðis mikil og nýðandi fyri hetta samfelag, hetta eru nevnliga tey øki, sum Javnaðarflokkurin fremstur av øllum flokkum her á tingi hevur bart fyri alt sítt politiska lív, tað kann eingin reingja, at soleiðis er.

Her verður tosað um hóttandi arbeiðsloysi, her verður tosað um uppsparingar, her verður tosað um, hvørt ein tvungin uppsparing í dag er skattur, ella tað ikki er skattur. Fyri einum ári síðan hoyrdu vit teir somum menn, formannin í Sambandsflokkinum, serliga tritta niður í veljararnar at hetta við at hava eina sambandsfasta eftirløn, var tann beri skattur, Fólkaflokkurin aftan á honum. Soleiðis, hava menn nú staðið alt hetta kvøldi og tráttað við hvønn annan, ja, eg vildi nær sagt, tað er lygn. So koma menn, nú Hergeir Nielsen oman á alt hetta her og leggja eftir Javnaðarflokkinum ja, sum ein fornermaður smádrongur, tí at Javnaðarflokkurin ikki nú er við í hesum stýrinum, sum skal framja hesi tiltøk, sum mugu og skulu takast.

Ja, hvør var tað serliga, sum ikki vildi vita av nøkrum javnaðarflokki, tá ið samráðingarnar nú í summar vóru um nýtt landsstýrið, og hvør tingflokkur sat kvøld eftir kvøld niðri á Gamla apotekinum og bíðaði eftir boðum um samráðingar, og hvør kom ikki? Har var so ikki nógv at gera hjá Javnaðartlokkinum. Vit liva í einum demokratiskum landi, Harra formaður. Tað er kanska seint

í orðaskiftinum nú, og tí skal eg heldur ikki gera nógv av í hesum føri, men eg má bara minna teir tinglimir, sum standa aftan fyri eina samgongu, at nú er tað teirra uppgáva at framja tann politikk, sum teir ætla. Meta teir, at Javaðarflokkurin hevur so nógv virði í øllum hesum, at eingi kann gerast uttan Javnaðarflokkin, ja, komið so til Javnaðarflokkin, so skulu vit vísa tykkum vegin. Takk fyri.

Hergeir Nielsen (LÍ.) viðmerking

Harra formaður.

Tað er ein viðmerking til Jákup Lindenskov. Hann segði, at eg var nústani vaknaður í hesum orðaskiftinum.

Eg skal gera honum kunnugt, at líka síðan týsmorgunin kl. 10°°, tá hetta orðaskiftið tók seg upp, er tað ein mann, eg havi mist burtur úmillum, og hann er John Petersen, og tað var í kvøld, tá eg var niðri á sjómansheiminum og át nátturða, tað tók eitt korter.

Eg bað um orðið her, tá ið Jógvan Adolf Johannesen sum ein av teim mongu, nevðí orðið her í kvøld kl. 23°° eftir listanum hjá formanninum, mann aftan á mann, hava javnaðarmennirnir gingið upp á hendan pallin og høgt og sparkað eftir tjóðveldisflokkinum, blað aftan á blað hjá teimum kann ikki lata vera við hesum, tá loyvdi eg mær at biðja um orðið fyri at svara aftur upp á hetta her, og sannliga hvat hendi. Jákup Lindenskov verður fornermaður um, at nakar er so frankomin, at hann svarar aftur upp á tað, sum javnaðarflokkurin skuldsetir okkum fyri.

Nei, tað kom eitt missjóð í seinastu samgongu, tað kom, tá javnaðarflokkurin tapti eitt fólkatingsval, og nú líður tað aftur ímóti einum fólkatingsvali, og tí er tað, at javnaðarflokkurin høggur sár í sár inn í tjóðveldisflokkin, hann ætlar sær atkvøður har, og tað er ikki við mýkindum, ið teir fara fram.

Teir fingu eina ávaring frá okkum undir seinastu samgongu, undir tí sokallaðu juniikreppuni, um eg kann kalla hana so, tá tingið varð kalla saman í ótíð. Teir vóru so ódemokratiskir, teir áttu leiðsluna í landinum, teir vildu ikki, at løgtingið kundi koma saman at viðgera fiskivinnumál. Tað var einki gjørt við fiskivinnumál í hesi 4 árini, tað hendi einki fyrrenn tá, tá varð javnaðarflokkurin ávaraður um, at hann sigldi streymasjógv, at vit kundu ikki finna okkum í framferðarhættinum hjá honum, og tí situr hann har, sum hann situr. Tað er vilt kjøt komið í javnaðarflokkin, tað etur hann inn at beini, og vit skulu ikki skera hann.

Jógvan Sundstein, løgmaður.

Harra formaður.

Nú rokni eg við, at orðaskiftið er við at enda, men eg skal kortini líka royna at svara einum tveimum spurningum, sum eru settir mær av Tordi Niclasen, fyrrverandi landsstýrismanni.

Tað fyrsta, hann spurdi um, var barnastyrkin. Um tað, sum stóð í løgmansrøðuni, var ætlan landsstýrisins, ella um tað vóru aðrar ætlanir, og lat meg siga, at tað, sum stendur í løgmansrøðuni, tað er tað, sum samgongan er samd um, tá ið samgonguskjalið varð skrivað í juni mánaða, og er í og fyri seg eisini tað, sum er ætlan landsstýrisins. Men sjálvandi er tað møguleiki fyri, at landsstýrisflokkarnir, um allir eru sandir, kunnu koma við einum broyttum uppskoti, og eg skal ikki heilt avvísa her í kvøld, at tá ið tað endaliga uppskotið um barnastyrk kemur, og tað fer at koma nakað skjótt, at tað tá verður eitt sindur øðrvísi enn tað, sum stendur í løgmansrøðuni, men eg kann ikki júst í løtuni siga, hvat ið tað so verður øðrvísi.

Tað varð eisini spurt um dagpeningsskipanina, upphæddirnar, sum standa á fíggjarløgtingslógini viðvíkjandi dagpeningsskipanini, og tað er rætt, at tær upphæddirnar eru settar av landsstýrinum við teirri ætlan, at lógaruppskot um broytingar í lógini um dagpening skulu koma her á ting, sum skulu verða galdandi, áðrenn fíggjarárið byrjar, soleiðis at hesar upphæddir verða lægri enn tað, sum tær annars høvdu verið eftir teirri galdandi lóg, sum nú er. Hesi lógaruppskot koma heilt skjótt nú í heyst.

Tað varð eisini spurt, um narkotikaráðið varð komið at virka. Nú er tað eitt øki, sum eg ikki umsiti, men sum verður umsitið av heilsumálaráðharranum Olaf Olsen, so eg fái ikki svarað nágreiniliga upp á tað, men eg haldi ikki, at sjálvt ráðið er komið at virka enn, men hinvegin vil eg siga, at vit í landsstýrinum eru ógvuliga ansnir eftir hesum viðurskiftum, og at vit eisini hava samband við politimyndugleikarnar júst um hesi viðurskiftini, soleiðis sum vit eisini høvdu tað, meðan Tordur Niclasen sat í landsstýrinum.

Eg haldi ikki, tað vóru fleiri spurningar, ið vórðu settir, eg haldi ikki, at tað er neir, sum eg átti

at svarað uppá.

Annars skal eg bert takka fyri umrøðuna. Eg haldi, at umrøðan hevur verið betri enn seinasti æraði røðari vildi gera hana til. Hann vildi líkasum siga, at tað alt alian dagin var tráttað og tráttað í móti hvørjum øðrum, tað haldi eg ikki rættiliga, at tað hevur verið gjørt. Viðgerðin hevur soleiðis sæð verið ógvuliga positiv, eg haldi, at vit hava merkt, at samgongumenn kenna sær sína ábyrgd av landinum, kenna sær sína ábyrgd av fíggjarlógini, sum hevur verið til viðgerðar, og eg trúgvi, at samgongumenn yvirhøvur eru samdir um, at hetta fíggjarlógaruppskotið, sum liggur frammi, tó hvussu so er nøkunlunda óbroytt fer víðari í gjøgnum fíggjarnevndina og til endaliga samtykt í tinginum.

Eg vil eisini takka andstøðuni fyri, at teir hava verið so, ja, hvat skal eg siga, at teir hava havt so lítið av veruligum atfinningum, sum teir hava havt. Teir hava havt nakrar pástandir, teir hava tívørri ikki havt nøkur uppskot um bata av lógini, tað hevur ikki verið nakað konkret um, hvat tá skuldi verið gjørt øðrvísi. Tað er ofta soleiðis hjá eini andstøðu, og kanska serliga við tað, at hetta er fyrsta fíggjarlógin, sum landsstýrið kemur við, og faktisk fyrsta fíggjarlógin, sum andstøðan veruliga kann viðgera eisini, at teir ikki eru vandir við at gera tað. Men eg vil sum sagt takka fyri eina góða viðgerð, hon hevur verið nógv friðarligari, enn eg hevði væntað. Tann stóri ágangurin, sum í bløðunum hjá andstøðuni hevur verið í móti samgonguni, hann hevur ikki viist seg her í tingsalinum undir viðgerðini, og tað vil eg eisini takka tykkum fyri.

Eg vóni sum sagt, at hetta uppskotið, sum nú fær sína viðgerð í fíggjarnevndini, fær eina góða viðgerð, og eg rokni við, at tað kemur so mikið skjótt aftur, at tað eisini er í rættiliga hampiligari tíð at fáa endaliga viðgerð her í tinginum.

Takk fyri.

Agnar Nielsen løgtingsformaður

So er tað ikki fleiri, sum hava biðið um orðið, og

málið fer so í figgjarnevndina.

Síðan fær løgmaður orðið til framløgu av tingmáli nr. 13 Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstuðning til ávísar pensionistar v. fl.

Løgmaður

Harra formaður!

Síðani 1980/81 hevur verið goldin brennistuðningur til pensionistar við fleiri sambart løgtingslóg ið einans hevur havt gildi viðkomandi figgjarár. Í 1988 varð ein stuðul til lutvísa rindan av samskiftisútreiðslum sum fast telefongjald, sjónvarpsgjald og útvarpsgjald lagdir afturat brennistuðninginum og í 1988 vórðu 2.200 krónur veittar pensionistum við fleiri í brenni- og samskiftisstuðningi. Landsstýrisins uppskot til løgtingslóg um brenni- og samskiftisstuðning í 89 er einsljóðani við lógina fyri 1988. Á figgjarlógini 1989 eru settar 7.360.000 krónir av til brennistuðning og samsvarar henda upphædd við mettu útreiðslurnar av uppskotinum. Og við formansins loyvi haldi eg, at eg skal noydast við at lesa grein 1 í lógini, lógin er tann sama sum hon var galdandi í fjør:

"Í figgjarárinum 1989 verður úr landskassanum veittur ein brenni og samskiftisstuðningur til pensionistar við 2.200 krónur til hvønn pensionist."

Hervið er lógin framlegd, og eg vil gjarna heita á tingformannin um at henda lógin kanska fær eina skjóta viðgerð í tinginum, av ti at helst skuldi pengarnir verið útgoldnir fyrist í oktober mánað.

Løgmaður

Harra formaður!

Fyri Jóngerð Purkhús, landsstýrismann, skal eg eisini leggja fram uppskot í tingmáli nr. 11, tað er veiting av ríkisborgararætti.

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at nevndu lógir verða lýstar at galda í Føroyum. Eftir hesum lógum verður eisini veitt fimm persónum búsitandi í Føroyum ríkisborgarrætt.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingi við viðmæli, og uppskotið er soljóðandi við formansins loyvi:

Uppskot til samtyktar: Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 190 frá 29. mars 1989 og lóg nr. 342 frá 24. mai 1989 um veiting av ríkisborgararætti verða lýstar at galda í Føroyum.

Hervið er málið framlagt.

Formaðurin

Síðani fær Niels Pauli Danielsen orðið fyri framløgu av tingmáli nr. 14: Skúlaviðurskiftini í Vági.

Niels Pauli Danielsen (kff.)

Harra formaður!

Landsstýrið samtykti á fundi hin 11. september 1985 at seta í verk tænastumannakanning av viðurskiftunum í Vágs skúla. Talan var um samarbeiðstrupulleikar millum nakrar av lærarunum og skúlastjóran. Tá ið tænastumannakanningin hevði vart í trý ár, og skúlin í øll hesi trý árini hevði koyrt væl, sum landsskúlafyrisitingin eins og allir lærararnir siga frá í kanningini, verður skúlastórin knappliga við tveimum daga ávaring suspenderaður, tað er koyrdur fyribils úr starvi. Hetta hendi til skúlaársbyrjan í 1988. Hin 20. apríl 1989 sendi Allan Moldke Hansen, forhoyrsleiðari, landsstýrinum niðurstøðu sína, sum frikennir skúlastjóran og gevur lærarunum skuldina fyri samarbeiðstrupulleikarnar. Landsskúlaráðið kom til tað niðurstøðu, at eingi grundarlag var fyri, at
loysa Jákup Olsen úr starvi, tað somu niðurstøðu komu løgfrøðingar í Tinganesi til í meting frá 18. juli 1989, sum sigur, Jákup Olsen kann ikki við støði í tænastumannakanningini og ávaring, átalu eina sekt og kann ei heldur verða fluttur til annað arbeiðsstað eina loystur úr starvi. Náttúrligasta loysnin er tí, at suspensiónin av Jákupi Olsen verður sett úr gildi, og at hann byrjar aftur sum skúlastjóri 1. august í 1989.

Skúlin í Vági byrjaði aftur eftir summarfrítíðina uttan, at suspensiónin var sett úr gildi, men landsstýrið samtykti á fundi sín 8. september 1989 at seta suspensiónina úr gildi og samtíðis mæla kenslumálaráðnum til, at loysa Jákup Olsen úr starvi við pensión og endurgjaldi, meðan teir 13 lærararnir, sum tænastumannakanningin sigur hava skuldina av samarbeiðstrupulleikunum, sleppa við eini ávaring ikki fyri samarbeiðstrupulleikarnar, men fyri at hava lagt arbeiðið niður í nakrar dag. Hetta tilmæli landsstýrisins hevur skeikað stóran part av fólkinum og verður spurt, hvør meiningin er við kostnaðarmiklari rættarviðgerð, tá gjørt verður beint í móti niðurstøðuni. Menn ivast í rættartrygdini serliga í tænastu-og arbeiðsmannaviðurskiftum og trúðvirði myndugleikanna, tí verður sett uppskot fram til samtyktar um, at landsstýrið tekur málið upp til viðgerð av nýggjum og roynir at finna eina loysn, sum samsvarar við niðurstøðuna í tænastumannakanningini og metingunum hjá landsskúlaráðnum og embætismonnum í Tinganesi.

Uppskotið er soljóðani við formansins loyvi:
Løgtingið heitir á landsstýrið um at taka skúlamálið suðuri í Vági upp til nýggja viðgerð og loysa tað samsvarandi úrslitinum av tænastumannakanningini, niðurstøðuni hjá landsskúlaráðnum og løgfrøðingum úti í Tinganesi.

Við hesum er málið lagt fram.

Formaður n

So vóru ikki fleiri mál á skránni til henda fundin. Næsti fundur verður í morgin, 21. september kl. 10°°, við hesi dagsskrá:
1. 1. viðgerð av tingmáli nr. 9, broyting í løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipatlotanum.
2. 1. viðgerð av tingmáli nr. 8, broyting í løgtingslóg um atuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.
3. 1. viðgerð av broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar.

Svar upp á fyrirspurning nr. 100-3.
So verður atkvæðagreiðsla um teir fyrirspurningar, sum eru fráboðaðir.
Framlega.

Fundur lokin.

Kl. 23^{45}.